



RI



Na

Telephone: +47

LØGTINGS-TIDINDI

1919

LØGTINGSTÍÐINDI A.

(Hitt munnliga orðaskiftið).

Eykatingsetan

og

Ólavsøkutingsetan

1919

Keypmannahavn

Prentað hjá J. H. Schultz A/S

1919—20

Hitt vanliga tingið var sett ólavsøkudag.

Løgtingsmenninir.

Victor Stahlschmidt, umbmaður.
Jacob Dahl, prógstur.

* * *

Fyri Norðoyggjar:
Rasmus Rasmussen, húskúlakennari, sj.
Joen Michael Mathras, keypmaður, sb.

Fyri Eysturoy:
Andreas Samuelsen, sýslumaður, sb.
Joen Poulsen, pens. kennari, sb.
Joen Jacob Weihe, kongsbóndi, sb.
Simon Pauli úr Kunoy, kennari, sj.

Fyri Norðstreymoy:
Michel Samuelsen, fiskari, sb.
Johannes Gutlesen, søglumakari, sj.

Fyri Suðurstreymoy:
Johannes Patursson, kongsbóndi (R.), sj.
Christoffer Nyholm Debess, tømsmiður, sj.
Poul Sofus Nielsen, prentari, sb.
Hans Christoffer Wenningsted-Túrgarð, byggmeistari, sb.

Fyri Vágar:
Rasmus Nielsen, keypmaður, sj.
Joen Rasmussen, keypmaður, sb.

Fyri Sandoy:
Mads Andreas Winther, sýslumaður, sj.
Johan Henrik Poulsen, kennari, sj.

Fyri Suðuroy:
Oliver Johan Thomas Ludvig Effersøe, sýslumaður, (R.), sb.
Eduard Esbern Mortensen, cand. jur., sj.
Daniel Johan Thomsen, keypmaður, sj.
Thomas Michal Strøm, trøsmiður, sj.

Til tingskrivara vórtu valdir *Joen Poulsen* og *M. A. Winther*.

Lykatingsetan ..... bls. 1— 59
Ólavsøkutingsetan 60 412

Evnisyvlrlit.

A merkir *løgtingstíðindi A* (hitt mannliga ordaskiftið).
B — *løgtingstíðindi B* („Sagreferat").
Blaðsíðutøl í *ogkalingseluni* eru merkt við eini stjørnu.

Akvegir, sí *Vegir*.
Amtmansins oinaráddu sakir. A: 426. B: 164.
Arbeiðisleysir fiskimenn, sí *Fiskiskaparviðurskifti*.
Blaauw, Håkon, Noreg, sí *Elektricitetsmál*.
Bókasamsoiðurskifti. A: 440, 441. B: 1.
Bókføring, Lóg um. A: 174, 182, B: 151.
Brúr. A: 74, 172, 326, 335. B: 186.
Bønarbrøv um stýrk frá Føroya løgting.
Føroya fálkaháskúli. A: 199, 214. B. 17.
Sildaveiðufelagið. A: 2*, 31*. B: 21*.
Stuðningur til E. Hansgaard. A: 263. B: 66.
Styrkur til keyp av oinari kúgv. A: 68, 197, 199. B: 74.
Sí umframt *Brúr* og *Landistoðir*.
Dalsgaard, Rasmus, Skálavík, sí *Landbúnaðarviðurskifti*.
Dampskipi, Keyp av. A: 1*, 22*, 45*. B: 9*.
Djóralæknaviðurskifti, sí *Landbúnaðarviðurskifti*.
Djurhuus, Hans Pauli, á Nesi, Porkeri, sí *Viðurlag*.
Egholm, Jacob Martin, Hvalvík, sí *Skattaklagur*.
Elektricitetsmál.
Brøv frá verkfrøðingi Wadén. A: 258, 376. B: 126.
Bønarbrøv frá Ó. á Hoygum. A: 2*, 31*, 48*. B: 14*.
Bønarbrøv frá Kvívík. A: 2*, 44*, 54*, 58*. B: 18*.
Gjald fyri rannsókn av áum og vatnum. A: 165, 172. B: 145.
Uppskot um tingfund við hr. Blaauw, verkfrøðing. A: 87.
Ymis onnur elektricitetsmál. A: 61, 69, 70, 89, 420, 436. B: 132.
Fiskiskaparviðurskifti.
Broyting í fiskiskaparlógini. A: 412. B. 91.
Fiskayngla vernd. A: 5*, 57*, 146. B: 24*, 90.
Lønhækkan til fiskavrakara. A: 164, 198, 200. B: 94.
Sjómarkið. A: 5*, 45*, 54*. B: 22*.
Stuðningur til arbeiðsleysar fiskimenn A: 20*, 55*, 112, 339, 366. B: 25*, 86.
Umsóknir frá Føroya skipara- og navigatørfelag. A: 108, 295, 321. B: 79.
Viðtøka um oðuveiðu. A: 60, 236, 284. B: 92.
Framburðsfelagið, sí *Fiskiskaparviðurskifti*.
Føroya fálkaháskúli, sí *Bønarbrøv*.
Grundlógarbroyting. A: 215, 348, 350, 393. B: 120.
Hansen, Hans, Tvøroyri, sí *Viðurlag*.
Havnabygging. A: 116, 117, 312, 326. B: 75.
Havnarreglurskipan, Broyting í Trongisvágs. A: 175, 182. B: 95.
Heilsuhótarviðurskifti.
Broyting í fátalkralógini (viðv. asponsku sjúkuni). A: 288, 299. B: 53.
Forðan fyri flutningi av smittusjúkum til Føroya. A: 391. B: 37.
Forðan fyri landfarsóttum í Føroyum. A: 391. B: 38.
Hospitalsmálið. A: 285, 394, 404. B: 31
Hækkan av lon hospitalskassameistarans. A: 146. B: 36.
Hækkan av stuðningi til kommunulæknar. A: 62. 330, 336. B: 47.
Jurðamoðraskipanin. A: 433, 436. B: 51, 201.
Kommunulækni í Fuglafirði. A: 386, 403. B: 39.
Kommunulækni í Vági (S.). A: 65, 370, 390. B: 41.
Læknaembætið í Vágum. A: 332, 339. B: 44.
Sanatoriilæknaembætið. A: 20*, 56*. B: 29*.
Sanatoriiviðurskifti. A: 120, 429, 439. B: 164.
Sjúkrahús í Vestmanna. A: 74, 433. B: 49.
Stuðningur til røntgenapparat. A: 281, 288. B: 36.
Tuberkulosulóg. A: 391. B: 39.
Heygum, O. á, Vestmannahavn, sí *Elektricitetsmál*.
Hospitalsmálið, sí *Heilsuhótarviðurskifti*.
Hansgaard, Elias S., Clöbu, sí *Bønarbrøv*.
Jacobsen, Hans, Tvøroyri, sí *Viðurlag*.
Jarðamoðraskipanin, sí *Heilsuhótarviðurskifti*.
Jensen, Poul, Sunnuba, sí *Skattaklagur*.
Joensen, Johs., Tvøroyri, sí *Viðurlag*.

Kennaraviðurskifti, sí *Skúlaviðurskifti*.
Kirkjur o. a. m.
Havnar kirkjugarður. A: 102, 374, 441. B: 28.
Lán til kirkjukassanna. A: 290. B: 30.
Prestahald. A: 276, 281. B: 26.
Stólasetur í Ness kirkju. A: 366, 436, 440. B: 27.
Kommunuviðurskifti.
Frítaking fyri at vera limur av valnevnd. A: 69, 236. B: 109.
Frásagnir sýslumanns. A: 286. B: 185.
Haldórsvík sum serstøk kommuna. A: 225 B: 99.
Hov sum serstøk kommuna. A: 189, 372. B: 98.
Líkning til løgtingið. A: 412, 433. B: 183.
Samtykt viðv. kommunuvali í Gásadali. A: 279. B: 107.
Sandvík sum serstøk sókn. A: 373, 391. B: 100.
Skatturin til skjútskassans. A: 391, 403. B: 182.
Tryggingarverk við ein veg. A: 370. B: 113.
Velbastaður og Kirkjubøur sum serstøk kommuna. A: 183, 439, 440. B: 102.
Útbýti av amtsfátækragrunninum. A: 392 403. B: 184.
Landbúnaðarviðurskifti.
Landbúnaðarskúli. A: 200, 271. B: 63.
Lønhækkan til djóralæknars. A: 60, 237, 409. B: 68.
Motorbátur til djóralæknans. A: 61, 237. B: 71.
Rannsókn av seyðasjúku. A: 60, 199, 214. B: 72.
Søla av prestagarðsjørðini. A: 395, 433. B: 54.
Vetrarfriðing og keyp av traðum. A: 402, 404. B: 60.
Latínskúli, sí *Skúlaviðurskifti.*
Lendistøðir.
Lendistøð í Eiðisvík (Viðareiði). A: 259, 287. B: 100.
Lendistøð í Nesi-Hvalba. A: 287. B: 103.
Lendiviðurskifti á Vágseiði. A: 285. B: 104.
Ymsar aðrar lendistøðir. A: 318, 335. B: 190.
Læknaviðurskifti, sí *Heilsubátarviðurskifti.*
Løgsavn, Føroyskt. A: 165, 433, 440. B: 152.
Løgtingið.
Lántøkur. A: 148, 347, 433. B: 146, 201.
Lógaruppskot viðv. amtsrepartitiónsskattinum. A: 436, 440. B: 115.
Nevnd viðv. løgtings- og skattalógini. A: 128, 307, 334. B: 116.
Telegram. A: 55*. B: 31*, 200.
Tingmannalønin. A: 299, 310, 325. B: 200.
Uppskot frá formanninum um fundir fyrrapartin av dagi. A: 322.
Val av nevnd viðv. landstingsnevndini. A: 10*, 20*, 55*. B: 27*.
Viðv. orðadrátti á tingi. A: 431, 443.
Mohr, Anna Sophie, Tórshavn, sí *Skúlaviðurskifti.*
Mortensen, D. J. Debes, Tvøroyri, sí *Kommunuviðurskifti.*
Motorbátahavn í Hovi, sí *Havnabygging.*
Müller, Peter, Kvívík, sí *Skattaklagur.*
Nótakast eftir seiði, sí *Fiskiskaparviðurskifti* (Broyting í fiskiskaparlógini).
Olsen, Ole A. F., Tjørnuvík, sí *Bonarbrot.*
Pensiónir, sí *Skúlariðurskifti.*
Petersen, Niels A., Tvøroyri, sí *Viðurlag.*
Prestagarðsjørðin, sí *Landbúnaðareiðurskifti.*
Prestahald, sí *Kirkjur o. a. m.*
Reiðarafelagið, sí *Fiskiskaparviðurskifti.*
Rættargongdarlóg fyri Føroyar. A: 146, 165. B: 154.
Rontgenapparat, sí *Heilsubátarviðurskifti.*
Sanatoriið, sí *Heilsubátarviðurskifti.*
Seydasjúka, sí *Landbúnaðarviðurskifti.*
Sildareiðjufelagið, sí *Bonarbrot.*
Sjómarkið, sí *Fiskiskaparviðurskifti.*
Sjúkrahús, sí *Heilsubátarviðurskifti.*
Skattalóg, sí *Løgtingið.*
Skattaklagur. A: 279, 281. B: 183.
Skipafelag Føroyarna, sí *Dampskipi, Keyp av.*
Skipara- og navigatorfelagið, sí *Fiskiskaparviðurskifti.*
Skjátslógini, Broyting í. A: 381, 411. B: 146.
Skúlaviðurskifti.
Broyting í bygdaskúlaskipanini. A: 100, 238, 281. B: 5.
Hækkan av lon yvirlæraranna. A: 7*, 20*. B: 30*.
Latínskúli. A: 317, 410. B: 4.
Lóg um læraralon. A: 299, 440, 441. B: 21.
Pensiónsrættur fyri realskúlakennarar. A: 195, 199. B: 19.
Pensión til kennaraenkju (Anna Sophie Mohr). A: 196, 199. B: 23.
Skúlabókanevndin (skrivilsi frá próstinum). A: 80.
Skúlahús á Hellunum. A: 72, 196, 199. B: 15.
Skúlahús í Lamba. A: 195, 199. B: 14.
Skúlahús í ymsum øðrum bygdum. A: 72, 146, 165, 437, 440. B: 9.
Skúlaskeið. A: 169, 198, 212. B: 24.
Studningur til pensiónsgrunnin. A: 289, 299. B: 18.
Svimjing sum lærugrein í skúlunum. A: 149, 366, 409. B: 25.

»*Skade- og Panteregistret*«, Lógguppskot viðv. A: 392, 403. B: 155.
»*Smirla*«, sí *Vørunevndarviðurskifti*.
Status, sí *Yvirlit*.
Studentafelagið, sí *Grundlógarbroyting*.
Svimjing, sí *Skúlaviðurskifti*.
Telefonviðurskifti.
Frágreiðing frá telefonnevndini. A: 80.
Hækkan av løn til roknskapargranskara. A: 323, 335. B: 181.
Hækkan av samtalugjaldinum. A: 296, 311. B: 175.
Løn telefonstjórans. A: 289, 299. B: 179.
Vidkan av telefon-netinum. A: 324, 335. B: 173.
Viðurlag til telefonstøðurnar á bygd. A: 289. B: 178.
Undirvísingarmálið, sí *Skúlaviðurskifti* (Broyting í bygdaskúlaskipanini).
Wedén, Theodor, Keypmannahavn, sí *Elektriciletsmál*.
Vegir.
Stuðningur til kommunalar akvegir. A: 102, 162, 214. B: 141.
Vegurin Havn Velbastað Kirkjubø. A: 259, 441. B: 114.
Vegur í Seyrvági, sí *Kommunviðurskifti*.
Weihe, Andreas, Selatrø, sí *Landbúnaðarviðurskifti*.
Vetrarfriðing og keyp av tuðnum, sí *Landbúnaðarviðurskifti*.
Viðurlag fyri bjarging av mannskipan. A: 163, 198. B: 97.
Viðurlag fyri skaða í grindadrápi. A: 196, 199. B: 109.
Vørunevndarviðurskifti.
Aftanlatingartíð í krambúðum. A: 435, 440. B: 162.
Avleka av ymsum forboðum. A: 118, 175, 268. B: 159.
Roknskapur vøruhandilsins. A: 183.
Viðurskifti viðv. »Smirla«. A: 261, 283. B: 157.
Yvirlit yvir økonomiska støðuna Føroya amtskommunu. A: 152. B: 203.
Oðuveiðu, sí *Fiskiskaparviðurskifti*.

Hitt munnliga orðaskiftið

á Føroya løgtingi 1919.

Eykatingsetan.

Fundur fríggjadag 24. jan.

Keyp av dampskipi.

1. viðgerð.

Winther: Eg havi verið við at biðja um at fáa tingið saman. Atvoldin er bræv frá tí nevnd sum Føroya skipafelag hevur sett. Sakin hevur verið til umroðu fyrr her á tingi. Hon var á eykatinginum fjør vár, tá tað tyktist at ráða um at keypa skip sum skjótast. Tingið tók væl við sakini tá. So kom hon fyri aftur á tí vanliga tinginum á ólavsøku, og nú var talan um keyp av einum størri fari, einum dampskipi. Tingið tók eisini hesa ferð væl undir og vildi ganga upp til 500.000 kr. í partapeningi ella láni, tá felagið hevði fingið tekna líka nógv. — Tað er eitt sindur broytt í hesi sak, síðani vit fóru av sísta tingi. Tað skipið — tað var eitt eldri skip — sum keypnast skuldi, varð roknað til at kosta 1 mill. kr. Nú er sum sagt nógv broytt úti í verðini síðani. Kríggið er endað so at siga. Og millum annað er skipabygging komin í meiri tryggar formar. Nevndin fyri hesum skipafelaginum hevur haft sínar menn utanlands til at arbeiða fyri seg og nu stendur okkum eitt nýtt skip uppá 1000 tons í boði, sum er at fáa fyri 730.000kr. Skipafelagið má hava 800 000 kr. til at seta fyritøkuna í verk við. Tað hevur verið hildið fram við lutatekningini síðani tingið síst var saman. Tá var teknað 130.000 kr. Nú spyr nevndin fyri skipafelaginum um tingið vil láta tað vera nóg mikið at felagið mótir fram við ¼ mill. og tingið so teknar líka nógv og annars garanterar tað lán, sum til skal. — Sakin liggur altso eitt sindur annarleiðis fyri nú, men hevur ikki skift karakter. Her er ein góð sak, sum tingið hevur sýnt vælvild og sum hevur verið væl undirtikin av fólki í Føroyum. Eg kann siga tað her, at tað er tekna reiðiliga nógv síðani á ólavsøku, so at nú er tað væl komið upp um tað ¼ milliónina. Tað tykist sum um vit hevðu kunnað haft skipið her í marts ella apríl. Eg vóni at tingið inlag vil síggja við sonn vælvild úppá sakina sum tað sá á ólavsøku. Vit mugu hugsa okkum væl um áðrenn vit vísa hesa sak frá okkum; tí fellur hon niður fyri, kann leingi bíðast, áðrenn hon verður reist aftur. Vit mugu royna at menna okkum til tær komandi tíðirnar, og hetta er ein sak, sum skuldi kunna nora væl um hjá okkum. Vit minnast tær kenslur og tá gleði, sum vit fagnaðu hitt fyrsta føroyska dampskipið »Føroyingur« við og sum fingu úttrykk m. a. í Rasmus Effersøe's vakra sangi: »Fyrr føroyskir bøndur — — «. Vit eiga at gleða okkum yvir framgongd og vit eiga eisini at hjálpa til at framgongd má verða. — Eg skjóti upp, at sakin fer í 5-mannanevnd og til at kjósa hana vil eg biðja formannin seta nýggjan fund tætt aftan á at hesin er liðugur.

Effersøe: Sagen om Støtte fra Tinget til Indkøb af et større Fragtskib har foreligget tidligere, og Tinget bad Vareudvalget om at støtte Sagen. Siden den Beslutning er der foregaaet store Begivenheder, idet bl. a. Krigen er at anse som sluttet. Det kan ikke nægtes, at dette er en Omstændighed, som maa have Indflydelse paa Lagtingets Sindelag. Der foreligger nu noget nyt. Naar Tinget nu skal til at behandle denne Sag, saa antager jeg, at vi maa gaa ud fra, at den Beslutning, som for i samme Sag er bleven tagen af Tinget maa anses bortfaldet. Mit Parti anser denne Sag for at være meget betydningsfuld, og den bør behandles derefter. Af den Grund vil vi kræve, at den bliver meget grundig undersøgt. Vi havde ønsket, at der straks nu havde foreligget udførlige Oplysninger. Men det er der ikke. Og derfor kan vi ikke engang tage foreløbig Stilling. Vi kan kun behandle den fuldt saglig. Vi er enige i, at Sagen behandles i et Udvalg, og vi er ogsaa enige i det foreslaaede Antal paa 5 Medlemmer.

Kl. 2½ varð settur nýggjur fundur og varð tá kosin 5 mannanevnd í hesi sak.

Fundur leygardag 25. januar.

Bønarbræv frá „sildaveiðifelagi" í Tórshavn um studning.

J. H. Poulsen: Tá tað er samtykt at taka sakina til viðgerð í hesi tingsamkomu, vil eg skjóta uppá at vit velja eina 5 mannanevnd til at taka sær av henni.

A. Samuelsen: Eg skal fyri okkara part slutta meg til at sakin verður send til eina nevnd. Vit vilja fegin yvirveya á hvønn hátt man kann styðja ta reynd, tí her er talan um. Síld hevur fyrr verið fangað, og við ymsum útfalli. Vit standa ikki her á berum botni. Tingið hevur fyrr anbefalla at staturin skal styðja reyndir til sildafiskarí. Men tingið hevur tó aldrinn fingið at vita hvussu tað gekk. Vit eiga at fáa at síggja berætning frá teimum, sum reyndirnar hava gjørt. Og nevndin má tí søkja efter hvussu reyndirnar hava gingið. Um tær ikki hava gingið so væl, so skal tað tó ikki ræða okkum, tí tað kann skyldast nógvum orsøkum at eitt forsøk mislukkast. Eg vil mæla til at man undersøkir sakina og tað forsøk, sum gjørt er, og yvirhovur at maum kannar eftir hvat tí áður fyriliggur viðvíkjandi hesum máli.

Bønarbræv frá O. á Heygum um studning frá statinum til kraftstatión

og

Bønarbræv frá forstandarskapinum í Kvívik um kraftstatión.

J. Patursson: Tá tingið nú er komið saman hávehurstíð er tað mest fyri at fremja tá eini umsókn um farmaskipið. Men tað eru eisini onnur mál løgd inn á ting. Og tað kann vera ymist um so nógvum tingmonnum dámar tað. Mær tykist tó, at hetta er eitt tekin uppá, at Føroyar eru í eini stoðu, sum bjóðar fólki til at taka upp nýggjar reyndir. Vit hava verið eftirbátar í mongum; tó ikki í øllum. Vit hava ofta verið ov seinir. At hesi mál koma inn á tingið týðir, at vit vilja vera við í framgongdini.

Í hesum viðfangi liggja tveir spurningar fyri um studnað til at fáa hita og ljós og mátt til verksmiðjur úr okkara fossum, vøtnum og streymum. Hevði tílíkt verið komið í verk einans fyri 10 árum síðani, tá stóðu vit betri fyri í hesum kríggsárunum. Og ikki minni kann hetta sigast viðvikjandi farmaskipinum, um vit hovdu átt tað í hesum árunum. Men tað gerst nú eingki við. Og vit mugu nú reyna at hjálpa tí, sum nú liggur frammi. Umsóknin um máttarstøðu í Vestmanna og Vágum er komin frá O. á Heygum og stýðjað av statsgaldsdirektør Andersen og vitaverkfrøðingi Vedén. Har er einki nevnt um pappírir, men tey eru til at fáa. Í Vágum og Vestmanna er granska hvat tí kann fáast burtur úr vøtnunum har og hvat tað fer at kosta. Tað er alt í lagi, alt er útroknað. Sakin er fullkomiliga upplýst. Hestakreftirnar eru 3 ferðir so nógvar, sum tað var roknað av fyrstan tíð. Eg skal mæla til at sakin fer í eina 5 mannanevnd. Hin sakin frá Kvívík er nýggj. Har ynskist at Leynará og Leynarvatn verður granskað, og tær skjóta upp at allir okkara fossar og streymar verða undirsøktir. Slíkt skal góð tíð til. Og hetta mál kundi tí kanska bíða til tað vanliga tingið á ólavsøku.

Iffersøe: Spørgsmaalet om Udnyttelse af Vandkraften har været fremme i offentlig Diskussion i adskillige Aar. Det samme har været Tilfældet i de nordiske Lande, Sverig, Norge og Island, hvor Vandkraften allerede til Dels udnyttes. Om denne Sag har der været skrevet en hel Del bor i Aviserne, ligesom den er bleven drøftet Mand og Mand imellem. Og der har ogsaa været Projekter fremme. Sagen har ogsaa foreligget for Lagtinget, som har stillet sig forstaaende overfor den. Det ses af Tingvedtagelsen i 1907 og ogsaa i 1910, fra hvilket sidste Aar jeg vil citere følgende af Vedtagelsen: »Under Forudsætning af, at der paa et sundt Grundlag dannes et Aktieselskab med det udelukkende Formaal for Øje at udnytte Vandkraften i Elven Fosaa ved Vestmannhavn ved Anlæg af et Elektricitetsværk, og paa Betingelse af, at Andrageren ikke faar nogen ledende Stilling indenfor Selskabets Bestyrelse som administrerende Direktør eller lignende, vil Lagtinget være villigt til af de til Tingets Raadighed staaende Midler at yde et saadant Selskab et Laan paa 50 000 Kr. — ..« Der er hidtil ikke for Færøernes Vedkommende kommet noget ud af denne Sag, meget naturligt, da Forholdene her ikke er saa gunstige for en saadan Udvikling som mange andre Steder. Den Elv, hvorom der har været Tale, Fosaa, har været paa private Hænder, paa en Haand, som ikke har haft Evne til at udnytte Sagen. Vandkraft har ikke været benyttet synderligt her til Lands, Uldspinderiet og enkelte Vandmøller har været de eneste Virksomheder, der har benyttet sig deraf. Der maa nu tages rigtig fat, og der er saa megen mere Grund dertil, som det efter Krigen gælder at arbejde og udnytte alle Hjælpekilder. Samfundet bør imidlertid have Haand i Hanke med saadanne Foretagender, og jeg maa tilraade, at denne Sag bliver nøjere undersøgt; jeg vil anbefale en sagkyndig Undersøgelse. Hertil kræves Regeringens Bistand. Til en saadan Undersøgelse, der skal vise, hvad en Benyttelse af Vandkraft paa Færøerne vil betyde, kræves at give sig tilstrækkelig god Tid, og hele denne Undersøgelse maa foretages under et, og det maa undersøges, hvorledes det forholder sig med private Interessar overfor disse Foretagender. Lagtinget har benyttet en lignende Fremgangsmaade overfor andre Sager, jeg vil her nævne Vejvæsnet. Denne Undersøgelse vil ikke hindre denne Sags Fremme, og vil kunne ske, haaber jeg, i den kommende Sommer. Den Sag, hvorom det drejer sig, vil alligevel ikke komme fremmes saa hurtigt. Naar jeg foreslaar denne Fremgangsmaade, er det ikke for at hindre Privatdrift, men jeg ønsker Privatdrift under offentlig Kontrol. Heller ikke vil jeg hindre Kommuner i saadanne Anlæg, de vil kunne iværksættes inden denne Undersøgelse har fundet Sted.

Man har talt for meget i Blinde om disse Sager, derfor maa man lade det offentlige foretage en saadan Undersøgelse. Hvad angaar Olaf á Heygnums Andragende, kan jeg henvise til hans tidligere Andragende, hvilket kan ses i Lagtingstidende for 1910. Det gik dengang ud paa, at der i Forbindelse med Elektricitetsværket skulde drives almindelig Købmandshandel, man skulde udelukke enhver stællig Konkurrence; Elektricitetem skulde udnyttes bl. a. til Snedkeri, Tømmerværksted, Uldvarefabrik, Belysning for Vestmannhavn og Omegn, overhovedet til at ophjælpe hvrosk Erhvervsliv. Lagtinget syntes ikke om denne Sammenblanding med Købmandshandel. Lagtinget syntes heller ikke om, at Virksomheden skulde ledes af Olavur av Heygum. Lagtingets Beslutning blev vedtaget med 17 Stemmer mod 2, medens 3 Medlemmer var fraværende. For mig vil det med Hensyn til selve Sagen ikke have Betydning, hvem der leder den, men for selve Sagens fremtidige Udvikling vil det have Betydning, hvem der er Leder af den. Vi savner Oplysninger. Der burde være indsendt et udførligt og vel funderet Andragende. Alle virkelige Oplysninger burde være fremlagt straks. Et Telegram af den Art som det foreliggende betyder i Virkeligheden ikke noget som helst. Vi maa have grundige og paalidelige Oplysninger, inden vi om en Sag kan sige: »Den Sag kan vi anbefale til Statens Støtte«.

I denne Sag er der Tale om Udnyttelse af Fosaa og forskellige Indsøer. Vi har imidlertid her paa Færøerne en Kraftkilde, som ikke bør lades ude af Betragtning, nemlig Havets Strøm, som man har tænkt sig at anvende; og jeg skal her henvise til Lagtingstidende for 1907 og 1910. Lagtinget har vist sig forstaaende og tilsagt Støtte; paa Grund af Krigen er der dog ikke kommet noget ud af det. Jeg vil anbefale Sagen til Behandling i Udvalget.

Elven Fosaa repræsenterer en Kraft paa 60 effektive Hestekræfter. Saa vidt jeg forstaar, er det ikke nogen stor Kraft. Hvad der her foreligger synes at kræve en stor Kraft, langt mere end de 60 H. K. Vi maa have fat paa andre Ingeniører.

Jeg anbefaler en indgaaende Undersøgelse af Sagen i Udvalget.

J. Paturssøn: Orðfararin fyri sambandsflokkinum hevur áttalað seg, og tað var at vóna, at vit í hesum og øðrum málum okkara landi viðvíkjandi kundu staðið sameintir. Hann nevndi ullvirkishúsið við Sandá og ymsar myllur, tað eru kortini eisini aðrar fyritøkur, ið hava nýtt vatnkraft áðrenn hesa tíð. Hann talaði um almenna rannsókn og at alt skuldi bíða til hon hevði verið, men eftir hvat hann seinni segði, havi eg vónir um, at tað ikki var so álvarliga meint. Eitt er at kanna eftir øllum máttarstøðum í Føroyum, annað at rökna út í smáum, alt ið teim viðvíkur. Orðfararin nevndi streymin norður við Hvalvík. Eg havi spurt tann mann, ið mest hevur skil á hesum í Norðurlondum og hann segði, at meðan so nógvur máttur er til í fossum og vøtnum, er tað langt tvorligari at fara til at taka kraft úr streymi, tí útbúgvingin er so nógv dýrari, streymurin er ójavnur, kyrrindir eru og hálvur streymur og tað skal nógv til fyri at javna kraftina. Tað kann jú vera, at síðani eg fekk hetta svarið, er hetta vorðið meira einfalt og biligari, eg skal einki kunna siga herum.

Eg skal so venda mær til tað, orðfararin sogði um, at allar privatar fyritøkur áttu at stodga til ein almenn rannsókn hevði verið. Um so er, verður henda Ólavs á Heygum fyritøka tann, ið fyrst eigur at verða hugsað um. Effersøe hevur altíð, táið slík mál hava verið frammi spurt: hvat hevur hesin máður áður gjørt, ið søkir um hetta og hetta, og tað eigur hann eisini at gera her. Sakin er so væl løgd tilrættis, sum hon kann vera, nógv arbeiði er lagt í hana og nógv er úr hondum greitt, alt utan eitt oyra útreiðslu fyri nakran almanna kassa.

Tað almonna hevur vissað sær alt eftirlit við hesi fyritøku, og og haldi, at vit saktans kunna geva hosari søk okkara góða viðmæli til státin; gera vit tað eru vónir til, at vit kunnu fáa elektrisk ljós til næsta vetur, meðan vit annars kanska koma at bíða í 10 ár aftrat.

Effersøe talaði um, at hetta verkið vildi geva bort 60 h. k.; nei, tað var hitt gamla verkið, ið Ólavur á Heygum fyrstu ferð ætlaði at fáa í lag, men tað vildi eisini bert kosta 100.000 kr. og ikki 2 milliónir. Hetta verkið her er útroknað til at geva 3000 h. k., og tað er roknað út av kønum monnum. Upplýsingar tróta ikki sakini viðvíkjandi og umsóknarmaðurin sigur í einum brævi sínum: »Jeg staar til Disposition med alle ønskelige Oplysninger.«

Beint hesin maður, ið her sokir tingið um viðmæli, kann hava góðar grundir til ikki at leggja meira fram enn tað ið neyðturviliga krevst; eg vil bert minna á hvussu gekst, tá hann hevdi lagt hina fyrstu telefonina. Men eg ivist ikki í, at hann, táið hann verður spurdur, vil geva allar upplýsningar, ið nýtast. Eg haldi ikki, at vit skula ganga ov nógv og kaga at hesum máli, tí og hugsi, at eingin her á tingi dugir at siga nakað munagott um eitt slíkt verk. Vit siggja bert, at elektricitetsverk kunnu gerast aðra staðni og renta seg ógviliga væl, og spurningurin verður so, um vit skula fáa okkum smærri elektricitetsverk nú ella bíða.

R. Rasmussen: Tað er møguligt at vit gera beinari at vit styðja eina minni fyritøku um at ganga tann veg sum Effersøe vísti á: at fáa alt undirsokt. Tað er sjálvandi gott. Men kemur tað ikki at tarna verkið so mikið at vit kølna fyri hesum máli. Siggja vit eitt gott praktisk úrslit úr einí minni fyritøku, so kunnu vit ganga til tær storru. Tað er hin beinasta leiðin. Tað er skiligt at vit eru í tí árhundrað tá elektriciteturin kemur at vera tann alt herskandi drívkraftin. Mær hevði dámt betri at vit her í Føroyum sjálvir tóku tað økonomiska takið. Men heldur enn at bíða nuga vit taka ta økonomisku hjálp sum bjóðast okkum. Tað sum fyriliggur av herokningum vísir at hetta praktisk kann gjognumførast. Um tað kann løna seg fyriliggur einki um. Og tað kann væl heldur ikki sigast fyri enn tað er roynt. Tí gera menn rættast at fáa eina roynd í lag. Men hvussu, kann eg ikki áttala nøg um. Tað má koma frá nevndini, og vit tá taka stoðu til tað.

Effersøe: Paturssøn bemærkede at jeg ikke havde taget alt med angaaende Udnyttelsen af Vandkraften. Det var heller ikke min Mening. Den Udnyttelse af Vandkraften, vi hidtil har haft, er rene Smating. Den rette Maade at gribe Sagen an paa er at faa en saadan Undersøgelse i Gang, som jeg har anført. Vi nede paa Sudarø vil ogsaa være med til at faa en saadan Undersøgelse i Gang. Ikn almindelig Undersøgelse behøver ikke at forvolde nogen Forsinkelse. Forholdene efter Krigen er af den Beskaffenhed, at større Anlæg

ikke kan anlægges med det samme. I den Tid vil man saa kunne foretage Undersøgelser. Der kan udregnes meget — om end ikke i Detailler paa Basis af Generalstabens Kort over Øerne og den aarlige Nedbør. En Mand, der kunde reise omkring her paa Øerne, kan hurtig danne sig en Oversigt og tage de vigtigste Beregninger. Jeg kan ikke sige, hvorledes en saadan Mand skal forholde sig. Men der maa kunne foretages en nyttig Undersøgelse indenfor et Omraade og indenfor en rimelig kort Tid. Det gælder om, at man kommer i Lag med denne Sag paa en heldig Maade fra Begyndelsen af. Den Mand, som har lagt Sagen frem for os, kunde have lagt den frem paa en anden Maade. Sagen er skrevet som et Brev, smurt op paa 5 Minutter. Det er ikke rigtig. Men jeg lægger ikke Vægt paa det. R. Rasmussen talte om de Oplysninger, som foreliggor. Der foreligger ingen Oplysninger. Angaaende Forstaaelsen af Sager som disse, da kan vi vel forstaa lige saa megot som andre Institutioner af samme Beskaffenhed som Lagtinget.

R. Rasmussen: Tað førir ikki langt at vit ganga meiri inn á ta tekniskn síðuna av sakini. Her má tað vera hin økonomiska síðan. Tað er av týdningi at vita at vatnkraftin verður brúkt. Nevndin má fáa útalilsi frá kommununum, hvussu nógv tær vilja taka av kraft. Tað er nakað reelt at halda seg til.

J. Patursson: Effersoe hugsar eisini um Suðroynna. Eg var eisini einaferð tingmaður fyri Suðroynna og ansaði eftir at har var nógvur máttur at fáa úr fjallafossunum. Suðroyingar kundu hildið sær ein verkfrøðing til at gera yvirlit um fossamáttin har og síðani snúgva sær ligar til tingið. Effersoe heldur at rannsókningar kunnu gerast við kortinum. Tað ber ikki til, sjógvurin norði við Stroym kann kanske geva ½ mill. hestakreftur. Tað hava vit ikki brúk fyri júst í stundini. Vit mugu heldur halda okkum til hetta, sum er á leið til at kunna setast í verk. Gongur hetta væl, koma tílík verk brátt út um allar Føroyar soleiðis sum vatnveitingarnar komu.

M. Samuelsen: Tað vil vera heldugt um tingið vil ganga við til et almindeligt undirsøkilsi. Tá forstandarskapið í Kvivík sokn biður um tað, er tað tí, at teir halda at tað offentliga trokari vil ganga við til undirsøkilsi av Leynarvatni enn til eitt almindeligt undirsokilsi. Hjá okkum eru soleiðis áir, sum eru frálíkar. Tað er neyðugt at báðar hesar sakirnar verða framdar í hesi tingsetu. Her má skuffast fuldstenduga klárar upplýsingar. Annars kann einki gerast.

Effersoe: Med Hensyn til en bestemt Undersøgelse paa Suderø har jeg benyttet Kortet og beregnet Nedboren, og havde ved samme Lejlighed godt Udbytte af en Bog om Vandkraftanlæg, som jeg fik fra Norge. Jeg forelagde min Beregning for en Ingeniør, og denne mente, at den var ganske god.

Patturson: Formaðurin fyri sambandspartíinum segði at Fossá í Vestmanna var ein av okkara bestu áum. Men tá er tað eisini natúrligt at hetta má vera tað fyrsta verk, sum vit mugu fremja. Hvat viðvikur spurninginum frá Kvívík um Leynará o. s. fr. e. er tað neyðugt at vita hvat mann kann fáa burtur úr tí. Eg skal anbefalla bæði uppá tað besta; serliga tað frá Vestmanna.

Samtykt var at seta eina 5 mannanevnd.

Bonarbræv frá Færoernes Rederiforening um at verja um fiskayngul.

Bonarbræv frá Færoernes Rederiforening um rúmkan av sjómarkinum

og

Bonarbræv frá Havnar framburðsfelag um rúmkan av sjómarkinum.

Konoy: Reiðarafelagið sendi í 1914 umbeðandi til tingið um at verja fiskaynguliu. Men so kom kriggið, og sjálvt grundarlagið var tá tikið burtur. Men nú er annarleiðis, og tingið eigur at taka spurningin upp, tí hann er týdningarmikil fyri eitt fólk, íð livir av fiskiskapi. Um vit evna at gera nakað, veit eg ikki. Men vit kunnu vísa at vit hava vilja at fremja hesa søk. Tað eru royndir gjørdar um hvussu fiskurin livir, ferðast o. s. fr. e. Danir hava her við oyarnar gjort royndir við at merkja fisk, og tað vísti seg at tann fiskur, sum var merktur her, eisini varð fangaður her, hvat íð sýnir, at fiskur er støðufastur. Okkara fólk er við at vit taka hesa sakina upp, og eg vóni at hon verður

væl samtykt. --- Og tað er líkaleiðis hvør Føroyingur sum er við táið talan er um at rúnka um sjómarkið. Vit hava í krigsárunum haft tað so heldigt at nógvur fiskur hevur verið við Føroyar. Hvat er orsøkin? Flestir svara at tað eru trolararnir.
Men vit kenna um at tað eins og liggur yvir Føroyum sum oin marra, síðani útlendingar fóru at oyða botnin utanum oyggjarnar, meðan Føroyingar tíðan sóbu svangir heima. Tað mátti gerast okkurt, og vit søktu ríkisstýrið um hjálp og fingu eitt danskt herskip her upp, og tað hevur hjálpt nakað. Men tað var ynskjandi at meira kundi verða gjort. Og nú er komið bønarbræv bæði frá Færøernes Rederiforening og Havnar fraimburðsfelag um at fáa fiskimarkið víðkað. Væl er tað so, at sogan hevur gjort, at vit eru komnir aftrat einum landi sum í ongum er okkum líkt, men vit kunnu tó hava tað treystið, at hetta landið vil hugsa um okkara viðurskiftir, táið státsmenn úr øllum londum koma saman, nú friðurin skal fástst í lag. Kortini er tað so, at vit eisini sjálvir eiga at verja okkara rætt. Tað hevur á internationalum konferencum verið hildið fram at botnurin eigur ikki at verða avoyddur á tann hátt, sum nú verið hevur, og so kundi kanska borið á, at vit fingu hesa broytan, ið her er talað um. Tíðin er uppi til at verja tey smán, og skuldi tað ikki komið til tess nú har suðuri í Frankaríki, vil óivað koma ein tíð, táið hetta fast í lag, og so er gott, at vit hava víst á hetta. Vil Føroya logting og hitt danska ríkisráðið geva sakini gott viðmæli, er okkara arbeiði ikki til einkis. Eg vil tí mæla til at vit geva sakina upp í hendur á eini nevnd við ø limum.

A. Samuelsen: Eg kann fyri ta síðu í salinum, eg hoyri til, slutta mig til talaran. Vit muga fáa hesn sak væl úr londum greiddu og niðursendu til regeringina. Vit hava haft sakina um »Beskyttelse af Fiskeyngel« til behandling fleiri ferðir; um vit fáa nakað framt nú, vita vit ikki, men táið vit hava gjort hvat ið vit kunna og sakin eisini er reist av Færøernes Rederiforening, kundi tað borið á, at vit fingu okkurt burtur úr hesum. Hetta at flytta markið er nakað, ið Føroyingar hava tosað um líka síðani, at trolarar fóru at koma her. Nú er so vorðið, at kríggið er endað og menn koma saman fyri at tala um, hvussu verðin skal skipast; tað er tos um at gera eitt »Folkenes Samfund«; tað er rímiligt, at man eisini har kann koma inn uppá spursmál av slíkari nátúr sum hetta. Hvussu úrslitið verður, kunnu vit ikki vita, men tað eigur eingki at kanna sigast uppá okkum fyri at vit hava forsomt hetta, tað verður kanska ovseint, um hetta fór at bíða til ólavsoku. Sakir sum hesar báðar krevja einki meiri undirsokilsi, men vit eigu at geva leimum gott viðmæli til regeringina, og eg anbefalli sakirnar til útvalgið.

J. H. Poulsen: Allir tingmenn eru einigir um at fremja hesa sak. Eg skal tí bert siga nokur fá orð um nakað, ið nertir hervið. Tað er víst á at fiskurin við Føroyar er stoðufiskur, og tí er tað óbotuligur skaði, um botnurin verður oyddur. Heimafiskiskapurin, ið altíð fer at verða í Føroyum, vil verða heilt spiltur, um trolararnar fáa loyvi at koma so langt inn undir landið sum nú.

Eg skal henstilla um man ikki kundi henvist sakina til útvalgið fyri siðlaveiði.

J. Patursson: Verður nakað burtur úr hesari sok, so verður tað veraldarreglur, ið settar verða, ið ikki kunnu broytast um logtingið kemur saman. Tað er ikki vert tandi annað enn at Føroyingar fara at nýta skavunót í framtíðini, og setji tí hetta fram, at vit muggu fáa slíkar reglur, at vit ikki í framtíðini vilja forða okkum sjálvum í at nýta teir mátar, sum menn aðra staðni nýta.

A. Samuelsen: Eg havi tonkt mær at sakin skal takast soleiðis, at sjóterritorið verður stórri, so vit koma til at ráða yvir stórri sjógvi enn nú; og hvat ið gerst har á tí sjógvi, ráða vit sjálvir fyri, t. v. s. okkara loggeving. Eg lugsi tí ikki, at vit standa í fára fyri, at missa ræðið yvir hvussu verður fiskað innan fyri okkara egnu sjómark.

J. Patursson: Eg havi ongantíð ivast um, at taka vit 3 fjóðringar úr Mikinesi og 3 fjóðringar úr Sunndne, so er tað ódeilis klárt, at har hava Føroyingar líka so fíttan rætt til at nýta skavunót sum bæði Bretar og Frausar. Vit siggja hvussu tað er vorðið hjá Bretum, teir hava friðað Moray firth fyri sær sjálvum, men ikki fyri øðrum.

A. Samuelsen: Tað dreyar seg um at fáa flytt markið út eftir so vit fáa ræðið yvir stórri sjógvi enn nú. Skuldi soinni koma annað fram, aðrar interessur, ið eru stórri enn tær gomlu, so muggu vit sjálvandi til teirri tíð broyta okkara roglur harafter.

J. Patursson: Tað vil altíð vera so at vit á fiskimarkinum kunnu nýta snori, líni og alm. notbrúk, men ikki skavunót.

J. Samuelsen: Tað havi og ikki tosað um, men hert um, at vit sjálvir kunna seta reglur fyri hvussu vit vilja nýta tann sjógv vit sjálvir ráða fyri.

Samtykt varð at beina sakirnar í tína 5 mannan-vnd.

Fundur mánadag 27. januar.

Skrivilsi frá hrr. O. Effersoe um hækkan av lonini til yvirlæraran við Havnar millum- og realskúla og fyristøðumannin við læraraskúlan.

Effersoe: Jeg vil gøre ganske kort, hvad jeg har at sige om denne Sag. Det vil staa alle Medlemmerne klart, at det har en stor Betydning, at Overlæreren ved Realskolen og Forstanderen ved Seminariet er dygtige og kundskabsrige Personer, og det er af særlig Betydning, at det er en virkelig fremragende Mand, der leder disse Virksomheder. Hvorvidt man kan faa en saadan, afhænger af den Løn, man giver; det vil sjælden være saadan, at nogen søger herop af særlig Lyst, men enten af Lønhensyn eller for andre Fordele. Det vilde forekomme mig godt, om de Embeder her, som ikke besattes af fastboende Folk, besattes paa den Maade, at man fandt noget yngre og dygtige Personer og giver dem Udsigt til at faa et godt Embede, naar de kommer herfra. Jeg læste i en norsk Avis, at man var meget betænkelig ved at Embedsstanden i Finmarken blev ringere og ringere, dels af den Grund, at Lønnen var for lav, og at man burde ansætte yngre Personer, som sikredes en god Gerning, naar de havde været der en passende Aarrække. Tinget bør overveje, om vi ikke bør yde en højere Løn til Overlæreren. Dette behøver ikke at tage saa megen Tid. Dette bør gøres nu, og navnlig naar vi tænker paa, at Overlæreren ogsaa forestaar Seminariet. Det er vigtigt, at dette har en udmærket Ledelse.

Prósturin: **Eg kann geva Effersøe viðhald í tí, at tað er av stórsta týdningi, at tann maður, ið leiðir hendu skúlan er væl mentur; og serliga tá talan er um seminariið. Tí hiðani ganga lærararnir út um allar Føroyar. Her er spurningur burin fram á ting at seta lønina upp fyri fyrstalæraran, tí mann haldur at tað vil gera sítt til at maðurin verður dugiligur. Møguligt at tað batar. Eisini møguligt at tað ikki batar. Tá talan er um at hæðka lønina, so er spurningurin hvussu lønin er fyri og í samanburði við aðrar lønir. Okkara lærarar við realskúlan eru lønaðir á sama hátt sum við líknandi skúlar i Danmark og fyrsti lærarin hevur umframt løn fyri sítt arbeiði við seminariið. Alt i alt hevur hesin læraarin um 5 000 kr. Og saman bera vit hetta við aðrar lønir, so er tað valla ovlítið. Hetta embætið en nú ledigt og ansøkningar eru komnir inn. Eg kenni fáar av hesum monnum utan av tí sum liggur upplýst í ansøkningunum. Tað er torfort at meta menn saman. Men so vítt sum eg havi kannað eftir, so haldi eg at hesir menn, sum her søkja, eru so væl kvalifiseraðir, at tað má vera forsvarligt at taka onkran burtur úr. Teir hava líkmandi eksamen sum menn fyri teimum. Tað eru 6 menn. Nakrir hava antin seminaristeksamen, studentaraeksamen ella eru cand. phil., og tveir hava teologisk eksamen. Teir menn, sum fyri hava verið, hava ikki haft stórri eksamen. Higartil hevur verið farið eftir tílíkum; serliga tá mann annars ikki kennir menninar. Mær tykir alt í alt at tað ikki er serlig grund til at gera broyting í tí sum verið hevur. Vit hava lug at bøta okkara skúla í ollum. Men at gera nakað nú í hesum einkulta tilfeldi, haldi og ikki vera grund til.**

Konow: Einans fá orð. Vit tingmenn eru vanir við at Effersøe sigir um eina sak, at hon er lítið upplýst. Nú kann sigast um hesa sak frá Effersøe. Hon er komin av knappliga inn á ting — komin just í teirri stund, tá direktiónin er við at innstilla ansøkjarar. Eg fari at spyrja eitt: Meinar mann, at tær menn, sum higartil hava leitt realskúlan og seminariið ikki hava haft tann rætta andan. Effersøe sigir: góðar kunskapir og rættan anda. Hvat meinar hann við anda í hesum tilfeldi? Er tað indremissión, ella bókirkjuligur andi, ella —?

Mortensen: Effersøe úttalaði, at maður, sum kom higar, skuldi hava serliga lætt at koma aftur til Danmarkar. Tað er anmerkt á finantslógini at serliga lærarar við

realskúlan og seminariið skulu hava atgongd til betri embætir.

Effersøe: Udtalelser fra Flertallet tyder paa, at alt er saa overmaade godt. Jeg frygter for, at det ikke er saa overmaade godt. Det er rigtigt, at denne Sag er lidet oplyst. Men Forholdet er saa, at det ikke godt kan være anderledes. Jeg har ikke været i Stand til at oplyse Sagen anderledes. Hvis Tinget foretager noget, maa Embedet opslaas igen. Det fremgaar af hele Sagen. Det blev nævnt før, at de Kundskaber, som de paagældende havde, synes at være tilstrækkelige. Det er muligt. Og det er godt. Men samtidig maa jeg sige, at jeg lægger mere Vægt paa de andre personlige Egenskaber, som den Mand eller den Kvinde maatte være i Besiddelse af. Jeg maa anbefale Skolodirektionen, at den ikke bare læser Ansøgningerne, men paa anden Maade søger at komme til Kundskab om de paagældendes Egenskaber. Der blev spurgt om, hvorledes jeg mener om de Mænd, som har været ved Realskolen. Der er ingen Grund til at tale derom. Deres Gerning er forbi. Endvidere blev jeg spurgt om, hvad jeg forstod ved den Aand, som denne Person skal bibringe Eleverne. Det maa være en Aand, som ikke gaar i nogen bestemt Retning. De unge maa personlig opdrages til gode Samfundsmennesker. Nogen Afhandling om dette Emne kan jeg dog ikke give. Jeg maa beklage, at der ikke synes at være Stemning indenfor Flertallet om denne Sag. Netop nu for nylig har man forhøjet Lønnen ved visse Embeder paa Øerne for at faa Tilgang, f. Eks. Præsteembederne. Jeg lægger Vægt paa gode Præster. Det er vigtigt, at disse Embeder besættes godt. Mortensen nævnte, at der i Anmærkning paa Finansloven var sikret disse Embedsmænd visse Fordele. Jeg har i sin Tid talt med Kultusminister Appel om disse Spørgsmaal og sagt, at det er vigtigt at faa disse Embeder vel besatte. Jeg foreslaar til denne Sag et Udvalg paa 5 Medlemmer.

Konow: Eg havi fingið svar frá Effersøe líkt sum hann vanligt plagar at svara á spurningar. Hann viðgongur, at sakin er komin knappliga inn á ting. Hann visti í summar at embætið var leyst. Og fyrst nú kemur hann, meðan hann veit at direktiónin hevur indstillað. Hann sigir, at hann kann merkja at fleirtalið er tilfriðs við skúlastandin her á landi. Eg sigi, at mær má hann ikki tilleggja, at eg havi verið tilfriðs. Um og ikki vil fremja hetta ídag — fyri tað eri eg ikki tilfriðs. Her skulu vit bøta um lønkorini hjá tí skúlamoistara, sum hægst hevur løn. Sambandsmenn eru ikki ókendir við tílíkar mátar. Vit hava sæð tað fyrr her á landi at sambandsflokkurin hevur arbeitt fyri at hæðka lønina hjá teimum, íð best eru lønтir. Eg hugsi her um ein mann, íð sat gunska gott í tí, men tað vóru tá settar kreftur í bevegilsi fyri at hæðka netupp hansara løn. Kanska tað er sambandshugsan, at hann íð nógv hevur, hann skal fáa uppaftur meira, meðan hann, íð einki hevur, honum skal tað sindrið frátakast, íð hann eigur. Nú fyrisker hrr. Effersøe at tann hægst lønaði lærarin i Føroyum, hansara løn skal hæðkast. Effersøe veit, at lærararnar i Føroyum eru ikki glaðir um tey kor, teir liva undir, og er tað lætt skiligt. At halda við at bjóða út embætir við einari grundløn uppá 700 kr., og samtíðar hæðka lønina hjá einum lærara íð er løntur við einari grundløn uppá 3000 kr. og sum livir í einum stórum, rúmligum húsi, tað saer út sum ein hán móti hygdalærarunum i Føroyum. Føroyskir lærarar fingu teirra løn ásetta við lóg av 1903 og var grundlønin tá sett til 500 kr. Danskir lærarar fingu í 1908 teirra lønir hæðkaðar, og sjálvt um grundlønin í Føroyum seinni er hæðkað til 700 kr. á teim flestu plássum, er lønin enn heruppi so nógv lægri enn í Danmørk. Táið lógin av 1908 var frammi í ríkisdegnum var Effersøe fólkatingsmaður, men teir føroysku lærararnar fingu einki, hóast teir donsku fingu lønir teirra nógv hæðkaðar. Og hvussu hava sambandsmenn áður vurderað tað arbeiði, føroyskir lærarar gera? Vit hava ár undan ári haft til umrøðu her á tingi at stýðja háskúlan við 300 kr., men hesum neyðar peningi hevur Effersøe verið ímóti meira enn nakar. Tað skuldi væl ikki verið tí at skúlin er national. — So hava Danir eitt undarligt begrep, íð eitur andin frá 48. Kanska sambandsmen vilja hava andan frá 1906 spøkjandi her á landi í mong ár enn? Tað tykist, sum hevur sýslumaðurin í Suðuroy fingið impulsir við at sigla fram við norska landi. Ja, tað hava mangir aðrir Føroyingar gjørt, men ikki er tað altíð vorðið so væl fagnað.

Eg má siga, at vit hava í hesum seinastu árum hoyrt so ómetiliga nógv um, hvussu Danir elska okkum, men hvussu ber tað so til, at vit ikki kunnu fáa okkara embætir sett utan at nøgta bjóða serliga høga løn, at vit ikki kunnu fáa ein

prest utan at hann skal liva sum prinsur á fyrsta klassa á Butnin og utan hann fær fría ferð til Danmarkar av og á. Eg veit ikki, hvat so hetta nógva tos um okkum sum eitt amt í Danmørk fer at týða. At vera forstøðumaður á seminariinum er ein umráðandi postur, men háskúlin hevur heldur ikki lítlan týdning fyri land okkara, og hann hava sambandsmenn altíð rovnt at kova. Kanska tað er fyri tann andan, ið er ráðandi har. Men um tað er tað, so trúgvi eg ikki, at forstøðumaðurin fyri læraraskúlanum, um hann fær nóg so stóra løn, vil kunna kova tann nationala andan í Føroyum.

Eg vil yvirlæraran avancera uttan við ein slíkan skúla. Tað lítur ikki út fyri, at ministeriið vil anseta yvirlæraran uttan teim treytum, at hann skal kunna ganga yvir til rektor við látínskúlan. Eg vil kortini gera mitt til, at tann maður, ið settur verður har, skal kunna gerast rektor se inni, og til at státurin sum skjótast stovnar ein látínskúla í Havn. Tað Effersøe heldur fram, at hesin maður skal mótarbeiða ein vissan anda og at hesin anli ongan rættning hevur, so veit eg ikki hvat hetta er, tí eg havi aldri hoyrt um nakran anda, ið ongan rættning hevur. Eg trúgvi tað, at Effersøe vil ikki rættiliga út við, hvat rættning hesin andin skal hava.

Eg vil yvirhoyra tann andan, ið ræður á seminarinum. Eg vil biðja sambandsmenn ikki hugsa einsíðiga; vit hoyra til eitt land, ið vit politisk eru ein partur av, men vit eru eisini ein grein fyri okkum sjálvum. Nertið ikki við hetta! Um Danmørk vágar at royna at denationalisera okkum, so garanteri eg ikki fyri, hvat ið hendir.

O. Effersøe: Min Hensigt var at sige at faa en første Rangs Kraft som Overlærer ved Realskolen. Det er muligt, at jeg kommer for sent, hvis saa er, skal jeg indrømme, at det er kedeligt, men jeg fastholder dot botydningsfulde i at besætte denne Stilling med en virkelig fremragende Lærer. Naar Hr. Konoy nu prøver at forbinde denne Sag med Storpolitik, sammenligner den med alm. Lærerlønninger paa Færøerne, kan jeg ikke indse, at der her er nogen sand Forbindelse; jeg forstaar godt, at Lærerne paa Færøerne ikke er tilfreds med deres Lønninger, og jeg har ogsaa efter Evne prøvet at hojne deres Løn. Det lykkedes Hr. Konoy at fremkalde Latteren fra enkelte af sine Partifæller, jeg synes ikke, at denne Sag er latterlig. Jeg talte ikke paa mine Partifællers Vegne, men jeg synes, at vi alle maa være enige om, at dette er en Sag af største Vigtighed. Spørgsmaalet er: Mener de Herrer Lagtingsmænd, at der vil komme saa mange Ansøgninger, at vi kan vente at faa Embedet forsvarligt besat. Hertil maa de enkelte Medlemmer tage Standpunkt, uden Hensyn til alm. Lærerløn, Samband eller andre uvedkommende Ting. Hvorledes Danmarks Regering vil stille sig til den nationale Bevægelse heroppe bliver et Spørgsmaal for sig.

R. Rasmussen: Eg skal ikki blanda meg í diskussiónina millum Konoy og Effersøe. Tað var týðiligt, at Effersøe meinti til, at menn, ið ikki taka lívsuppihald heruppi, skulu fáa hægri løn enn samsfelagar teirra í Danmark, og eisini fáa vónir um eitt hægri embæti, táið teir koma heðani. Hvussu hetta skal fáast í lag við yvirlæraraamm við realskúlan veit eg ikki, tí hann er í hægsta lønklassa; vit kunna væl løna honum hægri, meðan hann er her uppi, men táið hann so kemur niður aftur, mugu teir væl gera hann til adjunkt ella o. l. Sum yvirlæraran harniðri kunnu teir ikki fáa hægri løn. Vit hava borið upp á mál at fáa látínskúla í Føroyum, tá var Effersøe ikki við, men hvussu skulu vit kunna lata yvirlæraran avancera uttan við ein slíkan skúla. Tað lítur ikki út fyri, at ministeriið vil anseta yvirlæraran undir teim treytum, at hann skal kunna ganga yvir til rektor við látínskúlan. Eg vil kortini gera mitt til, at tann maður, ið settur verður har, skal kunna gerast rektor se inni, og til at státurin sum skjótast stovnar ein látínskúla í Havn. Tað Effersøe heldur fram, at hesin maður skal mótarbeiða ein vissan anda og at hesin anli ongan rættning hevur, so veit eg ikki hvat hetta er, tí eg havi aldri hoyrt um nakran anda, ið ongan rættning hevur. Eg trúgvi tað, at Effersøe vil ikki rættiliga út við, hvat rættning hesin andin skal hava.

J. M. Matras: Síðani vit tosa um skúlaviðurskifti skal eg siga nokur fá orð um nakað, ið kortini liggur eitt sindur uttan fyri hesa sak, nemliga um skúlan norðuri í Hvannasundi. Lærarituan, ið var har og í Árnafirði, er flutt til Klaksvíkar og teir halda har norðuri, at tað kann ikki ganga at ein skúli soleiðis verður niðurlagdur fyri so langa tíð. Eg vil tí bera uppá mál, um vit ikki kunnu fáa antin ein lærara fyri Hvannasund einsamalt ella ein lærara konstituerаðan sum kundi ansa báðum plássum.

O. Effersøe: Det vil være for vidtløftigt at komme ind paa, i hvilken Retning Skolen skal ledes. Jeg mente kun, at Skolen skal hverken være grundtvigiansk eller noget andet bestemt, den skal ikke ledes i nogen speciel Retning.

S. P. úr Konoy: Effersøe meinti, at um vit í skúlastýrinum hevði tann minsta illgruna á, at hesir ið søkja ikki vóru tilfullnar kvalificeraðir, so skuldu vit vera varnir við at anseta nakran af teimum. Eg takki fyri ráðið, men eg trúgvi ikki, at Effersøe

meinar, at vit ikki leggja okkum so nær við hesum embøti, sum vit kunnu. Eg fati ikki, at Effersoe kann siga, at og havi ikki tosað sakliga í dag, og havi altíð tosað um skúlaviðurskiftir, táið tey hava verið frammi á tingi, og eg havi altíð tikið tey ógviliga álvarsamt, men hvussu og fram beri míni orð, í hvørjum formi, og hvussu hvør tingmaður fram ber sínar orð, tað verður hansara sak. Tað kann ikki nytta at tosa um skúlaviðurskiftir utan at lugsa um tey í teirra heild og um tey vilkor, lærararnar skulu liva undir.

Tað var horið upp á mál at beina sakina í eina 5-mannanevnd. Við tað at bert 10 góvu atkvøðu fyri og eingin ímóti var sakin burturfallin.

Val av nevnd viðvíkjandi landstingsnevndini.

Edw. Mortensen: Í tingsetuni 1918 áttalaði løgtingið at landstingskommissiónin kundi koma at seta ilt millum Danir og Føroyingar, og at tingið ikki kundi taka nakað av andsvarinum harfyri. Tingið bað um at fáa loyvi til at siga eitt orð við, áðrenn landstingið domdi. Nokur vitnir hava nú verið fyri kommissiónini. Av teimum longu roðnu, ið nakrir hava hildið fyri hemmi (t. d. hevur amtmaðurin Rytter talað í 10 tímar), og tá ein kemur vitnini fhv. amtmann Rytter, Effersoe sýslumann, Samuelsen sysslumann, so er tað øvdvitað, at mong ymisk føroysk viðurskifti, eisini partapolitikurin í Føroyum, hava verið havd á máli. Undantikið embætismonnunum og einstøkum øðrum, ið hava fastar inntøkur, um teir eina tíð skuldu verið burtur úr landinum, vil tað verða so at siga ógjørligt fyri Føroyingum at møta í kommissiónini í Køpmannahavn uttan stórt tíðarspell og minkan av inntøkum. T. d. hevur sýslumaðurin Effersoe verið burtur í tveir mánaðir. Tað má vera tryggjalt fyri kommissiónina at fáa sær upplýsing um ymisk, og vit kunnu ikki beinan vegin acceptera sum beinan, ein dóm um føroyskan politikk, sum t. d. fanatikkarar sum fv. amtmaður Rytter ella líknandi fyrrverandi fanatiskir embætismenn í Føroyum seta fram. Kommissiónin ætlar væl direkta ella indirekta sum grundarlag fyri dóm um onnur viðurskiftir at døma um føroyskan politikk. Tví láta teir annars vitnini standa og tala langt og breitt um okkara viðurskiftir. Eg hakli, at løgtingið ella ein løgtingsnevnd hevur ein natúrligan rætt til at fáa sagt eitt orð við, tí hetta er ein klár føroysk sak, og sovorðnar eigir løgtingið at hava nakað at siga yvir, og tá serliga um talan skuldi vera um føroysk politisk viðurskiftir ella álop á ein stórri ella minni part av Føroyingum. Jørgen Pedersen, hr. A. Samuelsens partímaður, segði á sínum í landstinginum, at ætlan var at granska sjálvstýrisfloksins politikk. Tað tykist nú eisini at vera eitt av endamálunum fyri kommissiónini. Tað er nógv, sum peikar tann vegin. Tað er mín hugsan, at amtmaðurin Rytter og aðrir ætla at brúka kommissiónina sum eina politiska aktión móti sjálvstýrisflokkinum. Vilja Danir hava úpplýsing um politisk viðurskiftir í Føroyum, eru sannliga aðrir vegir at ganga um eitt so ekstraordinert stig, sum at stevna Føroyingum til Køpmannahavn inn fyri ein politiskan dómstól. Tí Danir mugu einaferð fata, at Føroyingar yvirfyri øllum fólkum, eisini norðmannfólkunum og har ímillum tí danska fólkinum, málsliga, historisk og eftir okkara serstøku viðurskiftum standa og koma okkum sum ein serstøk nation. Tað er eitt slag í andlitið á okkum sum nation, um Danir bera seg soleiðis at, at teir seta ein politiskan dómstól, sum við einum undantaki einans telur danskar monn til at forhøvra menn av einari aðrari nation í politiskum spurningum, harímillum nationalum spurningum. Tað hatar ikki at dylja, at tað er ein stórur nátionalur munur millum Føroyingar og Danir, og at Føroyingar sum tjóð nærmast dag frá degi, og tað mugu Danir gera sær klárt. Á sama hátt sum Danir í Sudurjutlandi yvirfyri Týskarum og Íslendingar eru eitt serstakt fólk, eru vit tað. — Á sama tíð, sum Danir siggja sínar bestu nationalu ynskir uppfyllast um at fáa Sudurjutland aftur, og teir hava givið Íslendingum sess sum ein suverenan stat í ríkinum — setur landstingið parlamentariska kommissión, sum tykist vilja granska eisini føroyskan politikk, serliga sjálvstýrisfloksins. Hesin flokkurin er tað nationala partíið í Førovum. T. d. hevur sjálvstýrisflokkurin í 1918 samtykt, at undirvísingarmálið skal vera føroyskt, hvat sambandsflokkurin ikki vildi. Tó vita vit, at tað í sambandsflokkinum er ein national fraktión. Altso kommissiónsins granskan fer og má fyri okkum fáa nin lit av antiføroyskum, og tað hendir í hesum tíðum, hvar nationalitetsprincippið góð-

kennist um alla verðina. Nú sær tað út, sum tað forist oin aktión móti oinum flokki, ið vil meiri sjálvstýri fyri eina nation. Logtingið úttaladi í 1918, at vit harmaðust um, at landstingið hevur sett niður oina parlamentariska kommissión til at granska føroyskan politikk, og vit samtyktu uppskot um at biðja justitsministaran fáa okkum landstingskommissións arbeiðið lagt fram á logting. Nú, tá kommissiónin hevur byrjað sítt arbeiði, tykist tað hóskandi, at tingið velur eina milluntinganevnd til at greiða sakina fyri tað komandi tingið. Av hesaari grund og teimum áðurnevndu orsøkum heldur minniluturin her í tinginum, at vit eiga at velja eina milluntinganevnd í hesum máli.

O. Effersøe: Der er ingen Grund for mig at komme ind paa nationale Spørgsmaal paa lignende Maade som Ordføreren for Flertallet. I sidste Tingsamling var Spørgsmaalet fremme om Landstinget havde Ret til at sætte en saadan Kommission. Vi har en Grundlov, som gælder for Færøerne. Den sidste Taler har selv stemt for. Og denne Grundlov giver Landstinget Ret til at nedsætte Kommissioner af denne Art. Saa længe Grundloven gælder for Færøerne, maa man bøje sig for det, som indeholdes i Loven. Kommissionen skal her undersøge Forhold, som vedkomme Riget som Helhed. Jeg forstaar ikke den Stilling, som Flertallet indtager. Man skulde jo synes, at netop Flertallet havde Interesse af, at Sagerne blev oplyste. Det kaster et Skær mod dette Parti, naar det modsætter sig Kommissionen. Her tales ikke om Dom, men om Oplysninger. Flertallet burde derfor gøre sit til, at Sagen blev oplyst. Dets Stilling tyder ikke paa at man er villig til at skaffe Oplysninger i paagældende Spørgsmaal. Vort Parti kan ikke være med til at nedsætte et Udvalg for at foretage noget i Anledning af Kommissionens Arbejde. Det er unødvendigt. Vi bør vente til Kommissionens Arbejde foreligger for Offentligheden. Skulde der da være Grund til at foretage noget ekstraordinært, saa kan man gøre det. Det vil være nogen Tid, men det vil vel foreligge inden Lagtingets ordinære Samling. Og da kan jo Tinget foretage, hvad det synes er rigtig. Jeg kan ikke se rettere end at det er Demonstration mod en Lovgivningsfaktor, mod Landstinget, om vi nedsætter et saadant Udvalg.

R. Rasmussen: Effersøe framhelt, at tey forhold, sum kommissiónin skal undirsokja, ikki serliga viðkoma Føroyum. Her hevur Effersøe rætt. Tað sum kommissiónin skal undirsøkja, er eitt forhold millum amtmannin í Føroyum og justitsministaran, sum hevur serliga við Føroyar at gera. Júst tí má mann siga at forholdið viðkomur Føroyum. Ein annar sok, sum kommissiónin skal granska, er adressan. Hetta viðkemur vael eisini Føroyum. Tá vit lesa Jørgen Pedersens talu í Landstinginum, so framgongur av honni við týðiligheit, at kommissiónin eisini skal granska partapolitikk í Føroyum, sjálvstýrispolitikk. Kommissiónin er serliga tilætlað at ransaka føroysk viðurskiftir. Her lann ikki komast utan um. At vit skulu gera móti anda grundlógar um vit taka hesa sak upp á tingi, tað kann eg ikki fata. Vit hava bara biðið um, at tað útfall, sum kommissiónin kemur til, og eisini tað, sum fram fyri kommissiónina er komið, má fyriliggjast tinginum til sína tíð. Tað hava vit loyvi til eftir logtingslógini. Tað sum kommissiónin hevur fyri er enn ikki officielt. Men nakað er komið fram í bløðunum um arbeiði hennara, t. d. í »Berlingske«, sum peikar í ta ætt at kommissiónin ikki er sinnað til at koma til Føroyar og sjálv fyritaka avhoyring har. Um kommissiónin er sinnað til at kalla Føroyingar til Keypmannahavnar, so nógvar sum krevjast, veit eg ikki. Men tað er óhugsigt. Mong kunnu já ikki hava ráð at fara. Fyri at bota um hetta, vil kommissiónin ístaðin lata ovrigheitina taka avhoyring her. Tað er við líkum orði sagt: upprorandi. Um nakað er í hesum, so er sjálv kommissiónin við at tradka á markið á grundlógini. At nakar pliktar at geva forklaring, er vitiligt. Men at kommissiónin setur ovrigheitina í sítt stað — er nakar so vágin, at forfolka grundlógina í tílíkan retning. Eg veit ikki um eg komi fyri kommissiónina. Eg skuldi einki hava ímóti tí, og havi eingan ótta fyri at bera tað fram, sum eg havi innanfyri. Eg eri til reiðar at geva upplýsingar fyri kommissiónini, men ikki fyri ovrigheitini. Eg skilji ikki at sambandspartíið kann seta seg ímóti at Føroya logting fær eitt orð at siga í hesum máli. Teir skylda okkum fyri at vit krúpa ínndan av raðsln. Teir krýpa undan fyri ikki at fáa sakina nóg offentliga fram fyri Føroya logting.

Edw. Mortensen: Eg havi aldri sagt, at landstingið ikki hevur juridiskan rætt til at seta parlamentariskar kommissiónir. Tað sum vit hava diskuterað um, er um tað er moralsk og nationalt forsvarligt at

granska serstakliga føroysk politisk viðurskiftir hjá eini slíkari kommissión. Orðførain fyri minni lutanum sigir, at meiri lutin her ikki hevur interessu av at fáa sakina upplýsta. Tað er júst tí, at vit vilja skaffa allar upplýsingar, at vit vilja fremja hesa sak. Ikki allir Føroyingar hava ráð, so sum Effersøe, at liggja í Keypmannahavn í 2 mánaðir. Vit hava allir grund til at skaffa upplýsingar. Tí tá harramir Rytter, Effersøe og Samuelsen avgova forkláring, vilja vit eisini sleppa fram at. Tað sum vit hava funnist at, er ikki, at landstingið hevur rætt at seta kommissiómir olla at ríksdagsmonn vilja skaffa sær upplýsingar um viðurskiftir í Føroyum, men tað er tann nýtti mátin, sum vit finnast at: Vit mugu krevja, at alt, ið kemur fyri kommissiónina, kemur offentliga fram, og veit ikki, um tað nakra staðni í verðini hevur verið siður, at parlamentariskar kommissiónir halda loynifundir. Lat tað endiliga koma fram, hvat hrr. Rytter, hrr. Samuelsen, hrr. Effersøe hava at siga um føroysk viðurskiftir. Eg skal altíð vera til reiðar til at geva mína forkláring skrivliga fyri kommissiónini. Um kommissiónin ynskir forkláring av monnum her og hon ikki sjálv kemur higar, sigst tað at skulla vera sorinskrivarin, ið vitnini koma at møta fyri, men tað er ikki ollum dánligt. So er ein løgtingsnevnd meira hóskandi, og kanska biður eisini landstingskommissiónin einaslíka nevnd um at geva teimum upplýsingar. Effersøe sigur, at kommissiónin skal ikki døma. Eg veit ikki, hvat hon skal annað. Hon skal útvega upplýsingar um ymis viðurskiftir og byggja ein dóm uppá tær, dóma fyrst og fremst um ministaran og síðani um føroyskan politikk. Eg skal mæla til, at løgtingið setur eina millumtinganevnd.

O. Effersøe: Det bliver gentagne Gange fremhævet, at Kommissionens Arbejde gaar ud paa at undersøge specielle færøske Forhold. Det nævnede f. Eks. Hr. Rasmus Rasmussen. Maa jeg spørge, om Ministerens Forhold til Amtmand Rytter er et indre færøsk Spørgsmaal? Selvstyrepolitikken er heller ikke et specielt færøsk Spørgsmaal, det vedrører hele Riget; for mig er det af Betydning, at man kommer til at kende dette Spørgsmaal til Bunds. Hvorledes Kommissionens Fremgangsmaade vil blive, er mig ganske ubekendt og vil ogsaa være de andre Herrer helt ubekendt. Vi, Sambandspartiet, vil ingenlunde modsætte os, at Lagtinget faar et Ord med at sige overfor Kommissionen. Der sidder i Kommissionen et Medlem af Lagtingets Flertalsparti. Hr. Edw. Mortensen er blevet opfordret til at møde for Kommissionen, jeg kan ikke gøre for, at han ikke har fundet Anledning dertil. Kommissionen er nedsat angaaende et Rigsanliggende og ikke angaaende Sanatoriet i Hoydal el. lign.

R. Rasmussen: Eg veit ikki hvat Effersøe meinar um serlig føroysk viðurskiftir; eftir hvat hann her sigur, hava vit eingi serlig føroysk viðurskiftir, tí eg komi eingi viðurskiftir her á landi, ið ikki viðkoma ríkisstýrinum. Hetta eru serlig føroysk viðurskiftir so vist sum nakað. Eg havi verið heskyldaður fyri separatist og mangt annað, men so vítt sum Effersøe nú gongur, havi eg aldrin gingið, at hevda, at nakrar viðurskiftir her á landi ikki viðkoma ríkisstýrinum.

Fundur kl. 1½.

J. Samuelsen: Orðførain fyri okkara partíi hevur sagt, hvussu vit ætla at stilla okkum í hesi sak. Eg gevi honum mín tilslutning. Okkara partí hvorki vil vera við at seta útvalg ella lata seg representera í slíkum útvalgi. Hin parturin má so sjálvur bæði seta og saman seta útvalgið. Eg síggi hesa sak soleiðis, at tað ikki er stór meining í henni. Um tingið í tí ordinera sambandi hevði vant sær til landstingið at fáa sakina, so kundi eg forstanda tað. Teir gjordu tað ikki. Justitsministarin hevur her einki at siga. Kommissiónin er sett til at avgeva indstilling til landstingið. Ikki til justitsministaran. Vit kunnu ikki fáa sakina í eitt útvalg fyrr enn hon er frakomin fyri offentligheitini. Einhvør vil kunna skilja at tað er eingin meiningur í at heimta upplýsingar fyrr enn teir eru til at fáa. Tá sakin liggur frammi fyri offentligheitini, so vilja vit taka spurningin fram um anleidningar verður til tað. Tað er hendan sak, sum vit nú behandla, ið gevur anleidning til at tingið kemur saman. Og ikki hin sakin, farmaskipasakin. Tað er hendan sakin; hitt er pro forma. Henda sakin hevur ligið aftanfyri alla tíð. Men kanska ikki hvor oin av teimum, sum hevur kallað tingið saman, hevur vita tað. Vit fáa einki burtur úr hesum. Vit fáa ongar upplýsingar frá kommissiónini fyri enn hvør

maður í Føroyum fær teir. Eg haldi, at tað vísir seg, at mann frá eini síðu í Føroyum ikki vil geva upplýsingar. Tingmaðurin fyri Tvøroyri vil ikki fara til Keypmannahavnar. Hann aniorirgrundir fyri at hann ikki kann, men tær grundirnar tjena einki. Allir skulu møta. Sjálv ólukkudýr sum ministar Zahle og Effersoe og eg og Paturssøn skulu møta. Sjálvstýrismenn vilja ikki geva upplýsingar. Og hetta útvalgið, sum teir ætla skal vera til at ikki upplýsingar skulu fáast! Men tað vilja vit ikki vera við til. Vit halda at landstingið hevur grundlógarsigaðan rætt til at seta hesa kommissión. Vit sambandsmenn vilja geva allar upplýsingar, antin teir eru so ella so. Hor vil man fáa íling útvalg, sum gør tað lættari fyri sjálvstýrismenn at siga nei til at geva upplýsingar. Tað stendur í viðtøkuni, at mann skal søkja upplýsingar um vissar sakir og geva innstilling til landstingið. Her skal ikki dømast, men søkjast upplýsingar. Og her hava vit eitt føroyskan representánt sum kann tala okkara sak. Mær tykist, at Mortensen var langt úti. Veit hann boskað um hvat fyrifarist er í hesi kommissiónini? Undarligt, at hann kann fortelja um ymist sum fyrifarist er hær.

O. Effersoe: R. Rasmussens sidste Udtalelse bekræfter, at Landstingskommissionen maa være beredt til at forhandle de Spørgsmaal, som foreligger, fordi de angaar Riget som Helhed.

Edw. Mortensen: Sjálvt um landstingið hevur við sakina at gera, so kann logtingið eisini hava við somu sak at gera. Til hrr. Samuelsen kann eg siga, at eg veit av, at vitnini hava talað fyri kommissiónini upp til 10 tímar, og tað hevur væl ikki verið talað upp í saman. Tá ein talar í 10 tímar, so má ein koma inn á mong føroysk viðurskifti. Donsk bløð úttala eisini, at her er talan um ymsar spurningar í Føroyum, sum skulu dragast framm. Hrr. Samuelsen segði, at atvoldin til, at tingið kom saman, er henda søk. Hann fær ilt gitir, hann ilt gør. Hrr. Samuelsen leggur alt út á tað illa. Hann umtalar mítt forhold til kommissiónina. Mitt forhold til kommissiónina rakar ikki hr. A. Samuelsen. Og hann framførir tað á ósannferdugan hátt og móti betri vitandi. Hann kennir skrivilsið eg havi sent til kommissiónina. Eg havi sagt, at eg vil geva allar upplýsingar skrivligа. Eg havi sagt, at tað er mær næstan ógjørligt at koma til Keypmannahavnar. Effersøe var noydður at vera burtur í tveir mánaðir. Tílíkt vil føra til stórt økonomisk tap fyri meg, sum havi stovnað nýggjan forretning her í býinum, sum eg ikki væl kann vera burtur frá. Eg vil skriftliga geva allar upplýsingar. Eg havi krevt at fáa at vita oll álop á meg, fyri at eg kann verja meg. At tingið setur millumtinganevnd, fyri at kommissiónin ikki skal fáa upplýsingar! Nei, tað er tvørturímóti. Tað er júst til at skaffa upplýsingar. Vit vilja hava sakina upplýsta. Kannske hrr. A. Samuelsen vil, at kommissiónin undar sítt verk, fyri at vit ikki skulu koma til orða.

R. Rasmussen: Effersoe má ikki halda, at tað er nøkur sameining millum meg og hann fyri tað at eg sigi, at kommissiónin situr við rætti. Tað er so varðið, at Effersoe sigir, at kommissiónin hevur fingið til viðgerðar 6 spurningar, sum skulu leggjast fram. Men tað eru spurningar til, sum ikki eru høskandi til tess. Og tað kann gera ólukkur, ikki so mikið fyri Føroyar sum fyri Danmark, alt tað at tað í Danmark er góður vilji til at gera gott fyri Føroyar, alt undir tí forútsetning at har í Danmark er ein góður vilji til at behalda Føroyar innan fyri ríkisseinheitina. Tað er ógviliga ringt hjá mær at skilja, at slíkir spurningar sum hesir kunnu havast til rannsóknar í einari slíkari kommissión. Tann nationala rørslan í Føroyum er varðin politisk, og tað er eina og aleina av tí, at ein flokkur herinni, teir ið eisini eru kallaðir heimadanskarar okkara, av einari ella aðrari grund hykla við eini aðrari nationalitet enn teirra egnu. Tað er einans undir tí forútseting, at henda skeiva uppfatan av okkara nationalu rørslu er varðin útbreidd í Danmark. At menn blanda saman nationalkenslu og státspliktkenslu, kundi tykist einum heilt løgið, tí hetta eru rørslur, ið eru hvørjumaðrum so heilt mótsettar. Tann nationala rørslan kann tykjast at sovna, táið hon er undir ringum korum, fyri at kykna upp aftur síðani, táið betri líkindi verða, eitt státspliktfølilsi kann tykjast at blóma undir press av státsmaktini, men táið hetta pressið verður tikið burtur, hvørvur henda kenslan við. Tað eru menniskjur, hvørja heilasnúðningar eru so trekir, at tær ikki duga at skilja her ímillum. Tað er ein vanhukka, táið nationalar rørslur verða tiknar upp til undersøkilsi av eini slíkari kommissión. Og at tað er ætlanin, sæst av teim orðum, Jørgen Pedersen segði, táið uppskotið kom fram á landstingi. Tað er ikki bert av eginkærleika, at vit vilja hava

hetta framt, men kanska mest av samkenslu við Danmørk. Tað er fyri at forða fyri slíkari vanlukku, at vit vilja hava hesa nevnd. Tað er nóg galið at her í Føroyum eru menn, ið ikki duga at skilja millum nationalkenslu og státspliktkenslu, men eru meira at teir hava fingið viðhald hjá monnum í Danmørk, og at teir hava fingið tað, er henda kommissión ein vitnisburður um.

A. Samuelsen: Eg spurdi tingmannin í Suðuroy, hvaðani hann hevði hesar upplýsingar um hvat ið var gjort í kommissiónini. Hann tyktist at vita meira enn fólk flest. Eg spurdi hann og hann sogði, at táið amtmann Rytter hevði tosað í 10 tímar, mátti hann hava sagt bæði tað og tað. Tað er nógso nógv at kunna slutta sær til hatta bert av tí, at amtmann Rytter hevur tosað í 10 tímar; hann tosaði forrestin ikki í 10 tímar, men í 12. Eg kann annars siga, at táið eg hevði sagt mín vitnisburð fyri kommissiónini, varð tað sagt við meg, at alt, hvat ið eg har hevði sagt og hvat ið eg hevði hoyrt, at aðrir hevdu sagt, var strengt hemmeligt; so Edward Mortensen vil skilja, at eg ikki kann siga frá, hvat eg havi forklúrað. Eingin hevði verið meira glaður enn eg, um alt í kommissiónini hevði verið offentligt. Táið Edward Mortensen sigur, at tað passar ikki, tað sum eg sagði, at hetta var tann sak, ið logtingið var kallað saman fyri, so hevur hann kanska eiuki vitað um tað, men eg ivist ikki í, at teir ið hava stílað fyri hesum her, ella í hvussu er onkur av undirskrivarunum hevur haft tann baktanka, at hetta var tann viktugasta sakin. Um so Edward Mortensen hevur latið seg lumpa, so er tað kediligt. Og tað vil væl eisini vísa seg táið damparin kemur til behandling, at tað kann ikki vera tað, ið hevur foranlediga hesa samling. Hr. Mortensen fanst at teim grundum, eg nevndi til at hann ikki fór niður fyri kommissiónina. Tær grundir eg nevndi havi eg lisið í einum føroyskum blaði, einum sjálvstýrisblaði. Táið eg fretti, at Edward Mortensen ikki vildi koma niður, trúði eg, at tað var tí Edward Mortensen var ein raskur ungur maður, ið segði sum so: eg komi ikki niður, tí vilja tit bitta Føroyingar, so kunnu tit koma til mín, og búgvi her og har, eg búgvi uppi í húsunum hjá Demmisi, men táið eg so las allar hesar grundirnar hví hann ikki kom, skammaði eg meg, tí vit eru kortini landsmenn. Eg haldi, at Edward Mortenten hevur gjort alt, hvat hann kann fyri at sloppa sær undan at geva upplýsingar fyri kommissiónini. Hann bjóðar sær til at geva skrivliga forklúring; tað hevur eingin biðið hann, men alt tað hann er biðin at gera, reynir hann at sloppa sær undan, so eg hopi, at landstingskommissiónin sigur sum so: vit hava givið Edward Mortenson leyligheit til at forklúra seg, men hann hevur sagt seg undan, tí sjálvsagt vildi kommissiónin betalt hansara ferð upp og niður og hansara upphald niðri. Kommissiónin kann ikki arbeiða á tann hátt, sum her er fyrisligið. Edward Mortensen veit gott, at landstingskommissiónin vil ikki brúka hesa nevnd til at geva sær upplýsingar, tað einasta ið vinnust av hesi nevnd er at Edward Mortensen og aðrir menn heruppi sloppa frá at útvalda seg fyri kommissiónini. Vit sambandsmenn vilja ikki vera við í einari so fjandtarari komedin, vit vilja lata sjálvstýrismenn vera einsamallar í hesum útvalgi.

Tað upplýsandi fyridrag, ið Rasmus Rasmusson helt táðni, var utan interessu fyri okkum sambandsmenn, tað var betri, at tað var hildið úti á húskúlanum. Rasmus Rasmusson vísti seg har sum ein rettbúgvandi sjálvstýrismann, hann kundi tí kanska heldur haft hildið taluna uppi á kvistinum, har plagar jú at vera moti summatíðir. Tær bemerkningar, sum Rasmus Rasmusson gjordi um nationalfolilsi og státspliktfolilsi — tað seinasta er forrestin eitt frálikt orð — eri eg ikki sannsintur við honum í. Eg haldi tvertur ímóti, at ju meira nátionálur ein er, tað vil siga nútionálur á tann retta mátan, jú meira státspliktfolilsi vil ein hava, eg veit eisini, at táið Rasmus Rasmussen hevur víst seg mest nátionálan, t. v. s. á tann retta mátan, tá hevur hann eisini átt mest státspliktfolilsi.

Líftir hvat ið eg havi frætt av kommissiónins arbeiði, vil man hava tann stórsta respekt fyri ollum nátionálum heruppi; tað er eisini tann almindiliga meining harniðri, at har er ein munur millum okkum og teirra, ið búgva har niðri, men vit mugu ikki siggja altfor einsiðiga uppá tað; tað er tað sum teir gera, ið hava tikið patent uppá tað nátionála heruppi, táið teir blása sovorðið upp til alt. So tosaði Rasmus Rasmusson um, at tað kanska var meira samfolilsi millum sjálvstýrismenn og danskarar enn millum sambandsmenn og hinar danskararnar. Eg veit væl, at tað nú er moderna í sjálvstýrisflokkinum at hoyra nn eitt gott forhald til danskararnar, eg haldi meg trúgva eg veit, hví tað er so; men og eri eisini glaður yvir tað, tí eg

hopi, at tað vil koma til at vera álvara av tí, táið leyligheit har til verður.

R. Rasmussen: Tað ljóðar sjálvironisk tá A. Samuelsen vil siga mær, hvat eg skal tala um á tingi. A. Samuelsen má vita, at tað nationala og tað statsliga ikki altíð fellur saman.

A. Samuelsen: Tað, vil vísa seg í referatinum, hvussu vit báðir hava talað.

J. Patursson: Tá eg her eri einasti maður í hesi nevnd, sum sett er í danska landstinginum, so er tað sjálvandi at eg vil siga fá orð á hesum fundi, tá tað er borið fram at seta eina millumtinganevnd, sum kann virka nakað í ta ætt sum tann nevnd, sum eg sati í. Tað gleðir meg at hetta er framkomið og eg vil takka tinginum fyri tað. Tað tykist mær illa at hin flokkurin sigir, at hann ikki vil vera uppi í her. Teir hava annars sín fría rætt til ikki at seta nakran mann. Eg haldi at tá landstingsnevndin er sett til at fáa allar upplýsingar av øldri og yngri datoe viðvíkjandi føroysk viðurskifti, og tá hendan nevnd er skírd Færøkommissionen, so kann man einans siga, at hendan nevnd vil granska júst føroysk viðurskifti. Tað er so, at tað er ein Føroyingur í hesi nevnd, og tað er eg. Tað er ein av ellivu monnum. Og hesin maður má tá fáa nógv at gera. Eg má nú ná lagsa at landstingsnevndin vil vera fegin at logtingið vil seta eina nevnd til at útvega teimum upplýsingar, sum oin maður ikki kann fáa fram utan við ógviligari langari tíð. Eg mátti tá hava fyri mær ikki minni enn eitt ár um alt tilfar skuldi koma fram, sum eg haldi skuldi fingist til vegar. Og tá mátti eg einki annað arbeiði havt at gera utan hetta eina. Vilja vit skunda undir verkið so má just ein tílík løgtingsnevnd kunna gera eitt gott arbeiði til at landstingsnevndin kann verða toluliga skjótt liðug. — Eg vil nevna við einstøk ting, sum eru eyðkend fyri A. Samuelsen's røður á Føroya løgtingi. Hann hevur lagt hesar 12 monn, sum hava fingið tingið samankallað fyri at hava farið við leynibrøgdum, sum vit ikki tora at leggja fram í dagsins ljós. Tað kann vera ringt at venda slíkum álopum aftur. Men og skal prógva at hetta er illavorðið briksl, sum representanturin fyri Føroyar hevur sett á allar okkum. Tá og fór til útlondini á veturnátt hevði eg boð um skips keyp við mær. Fyri jól tá eg kom heim fekk eg boð at bera aftur úr Keypmannahavn at útlit var til at skip var at fáa. Farmaskipanevndin kallar so saman til fund, og hað nakrar tingmenn koma við. Nevndin segði tá: vit vilja fegin koypa, men tingsamtyktin frá í summar er so at vit fáa ikki val tann studning, sum varð ætlaður okkum; tað eru eingi onnur ráð enn at tingið má koma saman. Aleina út av hesum er tað at tólv menn hava skrivað til amtið um at fáa tingið saman. Tá eg havi sagt hetta vil alt rætt hugsandi fólk trígva mær hvat eg sigi. So vildi eg eisini vísa á, hvat hesin representanturin, sum Føroyingar hava fyri sær, umtalar høvdingin í Danmarks ríkisráð, tað hevur ofta verið borið fram frá Danmarks síðu, hvussu sjálvstýrismenn mótala Danir. Men hann er so óforur í sínu roðu at hann kallar tann ovasta chefin fyri eitt ólukkudýr, tað er á donskum: en Skakkel. So var tað eitt triðja ting. Hann sigir at orðfararin hjá okkum hevur fingið upplýsingar frá mær, tí eingin kundi hava upplýsingar frá kommissionini uttan eg. Hartil vil eg fyrst lesa upp, hvat sum stendur í donskum blaðum. Í »Kobenhavn«, sum A. Samuelsen ialfall fyrr - - eg veit ikki nu nú — hevur verið vinur við, stendur: »Som bekendt har Hr. E. Mortensen erklæret ikke at have Tid til at komme til Kobenhavn for at afgive Forklaring til Kommissionen. Et anstet Led i dette Forhalingsarbejde fra radikal Side siges at skulle bestaa i et fremsat Krav fra Landstingsmand Paturssons Side om, at en 25 Færinger skal hentes hermed for at afgive Forklaring. Men om dette vil blive imødekommet fra Kommissionens Side, staar dog foreløbig hen i det uvisse«. Tá nú blað hava fingið hetta at vita, at eg havi krevt, at 25 Føroyingar koma niður, og so onkur kemur og spyr meg: Hevur tú sagt hetta? so má eg kunna svara til tað. Her hevur »Kobenhavn« ivaleyst fingið at vita frá hogri ella vinstrimonnum. So kemur seinni »Kristeligt Dagblad«: »Et af Kommissionens Medlemmer, Landsthingsmand Patursson, har stillet Forslag om, at Kommissionen skulde rejse til Færøerne for der at foretage Afhøringer af en Del Færinger. Dette vil dog neppe ske, men det menes, at flere Færinger og herunder maaske fhv. Folketingsmand Mortensen vil blive afhørt hjemme ved den stedlige Øvrighed«. Tá nú nakar kemur og spyr: Er tað satt? so má eg siga: Hetta er beint; at hetta hevur verið á máli, kann eg ikki nokta fyri. Um tað einans var eitt einstakt blað, so kundi man siga, at hetta hava teir gitt sær til. Men eisini »Borlingske« hevur tað sama;

»Spørgsmaalet om, hvorvidt Kommissionen skulde rejse til Færøerne for at foretage Afhøringerne af flv. Folketingsmand Mortensen og andre internsseredo Føringer har været rejst indenfor Kommissionen, men vandt — for at bruge et mildt Udtryk — ikke Tilslutning, og den paatænkte Afhøring af Føringer vil i Stedet for finde Sted ved den stedlige Jurisdiktion«. — Tað nytlar ikki at ivast í at hetta er beint. Tá mínir partímenn hava spurt meg um kommissiónin hevur fingist við føroyskan politikk, so má eg kunna siga tað.

Edv. Mortensen: Tað er eyðvitað, at vitrini hava talað eisini um partapolitikk í Føroyum. Tá ein ber alt saman, so er ikki at ivast í, at føroyskur politikkur hevur verið umtalaður. Tá hr. Samuelsen sigir, at eg búgvi hjá Dommussi, so er tað ikki satt, tí eg havi betalt húsini. Men A. Samuelsen hevur ikki betalt sítt, men staturin. Hann býr tí í einum statsanstalti og hoyrir kanska eisini best heima í einum statsanstalti fyri býttlingar. Eg ætli ikki at nøta í Keypmannahavn utan at eg annans skuldi vera staddur har; heldur ikki fyri ovrigheitini her. Men kommissiónin kann koma til Føroyar ella skriva til mín. Hr. A. Samuelsen meinti, at kommissiónin ikki vil bráka hesa millumbinganevnd. Hr. Patursson hevur ta mótsettu sjón uppá tað. Annars ætli eg at senda kommissiónini manuscript av tí, eg havi sagt.

Joen Poulsen: R. Rasmussen holdt et langt Foredrag om nationale Følelser og Rigspligtfølelser og endte med, at Selvstyrepartiet havde en stærk Samfølelse med Danmark. Men det Papir, som vi nu har til Behandling, viser ingen stærk Samfølelse. Det taler om en Kommission, som er nedsat af »Danmarks Riges Landsting«. Jeg tør ikke ganske bestemt benægte, at der findes andre Landsting end det danske. Men vi behøver ikke særlig at lægge Vægt paa, om det er det danske Landsting eller det tyske, men naar jeg hører saadanne Udtryk minder de mig altid om, at de har ingen Samhørighed med Danmark. Den danske Rigsdag skal være en Modsætning til noget færøsk, og disse Ord er ikke komne ind i Udkastet uden efter moden Overvejelse.

A. Samuelsen: Tingmaðurin í Kirkjubø segði, at hann var glaður yvir, at nakrir løgtingsmenn høvdu borið hesa sak fram, men so vítt eg minnist, stendur tað í brævinum til tingið, at teir hava borið hana fram fyri sjálvstýrismenn. Tingmaðurin í Kirkjubø er jú formaður fyri partinum, og báið hann hevur takkað hesum monnum, hevur hann eisini takkað sær sjálvum. — Sjálvstýrismenn eru jú menn fyri at fullføra sakina líka so væl sum teir hava reist hana. Men vit samhandsmenn vilja ikki vera við. Sjálvstýrismenn verða einsamallir í útvalginum, og enn betri má bora til hjá teimum. Jóannes Patursson segði, at tað var viðtikið í landstinginum, at undersøge forskellige færøske Forhold af ældre og nyere Dato«, so viðvíkur hetta einari bestemtari sak og ikki føroyskum viðurskiftum yvirhovur. Eg veit ikki um landstingskommissiónin verður glað yvir, at henda nevnd er niðursett. Tað kann vera, men at sita her og spæla komedin til gleði fyri einari landstingskommissión, tað haldi eg ikki, at vit skulu gera. Landstingskommissiónin skal biðja um tær upplýsingar, hon vil hava; tí er Jóannes Patursson væl settur har, ti hann hevur skil úppá føroyskum viðurskiftum, so hann kann siga kommissiónini, hvat hon skal spyrja um, tað er ikki meiningin, at hann skal rása Føroyar runt fyri at samla upplýsingar.

Men hvat fær so henda nevnd at týða? Yvirfyri kommissiónini hevur man plikt til at siga samleika, men hernæst, ja eg vil ikki siga, at man skal ljúgva fyri kommissiónini, men yvirfyri einari løgtingsnevnd er eingin pliktaður til at geva aðrar upplýsingar enn hann hevur lyst til. Eg haldi at løgtingið skal bíða við at niðursetta hetta útvalg til løgtingið hevur fingið parlamentariskan rætt; sum nú er, verður henda nevnd utan týdning.

Eg havi ikki kallað justitsministaran óhukkudýr; vil Jóannes Patursson kalla hann soleiðis, so verður tað hansara sak, eg haldi tað vera heilt ótilbørligt, at hann fær lov til at siga sovorðið. Eg haldi, at landstingsmaðurin tekur sær starv sítt sum limur av kommissiónini nakað lætt, báið hann letur fólk gita, hvat ið er fyrigingið í landstingskommissiónini; á tann hátt kann man fáa alt at vita, hvat ið hevur fyrigingið í landstingskommissiónini, bert ein vil gita nóg dúliga. Men hatta er so tvørtur ímóti hvat eg havi fingið inntryk av, at kommissiónin heldur um sína tavsheitsplikt. Hvat ið hasum bløðum viðvíkur, ið Jóannes Patursson las upp, so havi eg ikki givið teimum nakrar upplýsingar; um Jóannes Patursson hevur givið nakrar, veit eg ikki; og havi ongar givið.

Edward Mortensen vil geva allar upp-

lýsingar til kommissiónina, men hann er ein raskur maður, hann vil helst hava 200 míl millum seg og kommissiónina. So finnast Edward Mortensen at, at eg hevði sagt, at hann búði í búsinum hjá Demmesi. Ja, soleiðis hava tey itu fyrr, og og síggi einki ilt í at kalla tey so. Tað kundi aldrin fallið mær enn at trú, at hann ikki hevði betalt síni hús, og eg segði heldur einki um tað. So segði Edward Mortensen, at eg hevði ikki betalt míni hús; nei, og eigi eingi hús. Eg havi eina ferð átt eini hús, og tey havi eg betalt, nú eigi eg eingi hús. At eg ikki havi betalt stastins sýslumanshús haldi eg ikki tað er vert at briksla mær. Edward Mortensen tordi ikki briksla umtrannininum, at hann ikki hevur betalt síni hús, hann tordi ikki siga tað við Mads Winther, at hann ikki hevði betalt síni hús, ikki hevði betalt sýslumanshúsini í Sandi, um har eru nøkur, sýslumann Nielsen hevur ikki betalt síni hús, sorenskrivarin og fútin hava ikki betalt teirra hús; Edward Mortensen tordi ikki siga tað við teir, at teir ikke høvdu betalt teirra hús. Tað var meiningin at genera meg, og formaðurin gav honum ganska róliga lov til at genera meg. Nu gevur hann mær lov at svara aftur, og so er tað kanska gott.

R. Rasmussen: Samuelsen hevur nu so ofta proklamerað, at sambandsmenn vilja ikki vera í hesari nevnd, men um vit sjálvstýrismenn velja hann, má hann vera har, annaðhvørt hann vil ella ei, eg sigi ikki, at vit fara at gera tað, men vit kunnu gera tað. Jógvan Poulsen er á tí gomlu leiðini, sum sambandsmenn nú so leingi hava fylgt, at leita alla staðni eftir separatismu. Nú er komið at standa í bræði okkara hitt danska landsting. Eg skal bert vísa á, at hatta er ein máti, ið leingi hevur verið nýttur, at vísa á: síggið, har var separatismin, hygg har var hon.

Edw. Mortensen: Samuelsen segði, at eg ynskti helst 200 míl millum meg og kommissiónina. Kommissiónin kann já skriva til mín, og tað hevði verið lættari fyri allar partar. Eisini haldi eg, at tað var lættari, um kommissiónin kom til okkara, hon kann t. d. velja 3 menn, ið kunnu koma her upp. Tað er kortini lættari enn at lata allar teir Føroyingar, ið skulu avhoyrast, fara niður.

A. Samuelsen: Tað er ikki lættari fyri kommissiónina at koma til herupp, enn fyri Føroyingar at fara niður. Kommissiónin bestendur av 11 monnum; tingmaðurin í Kirkjubø visti ikki hvussu mangir teir vóru, men eg kann upplýsa hann um, at teir eru 11.

Edw. Mortensen: Tað er ikki talan um at oll kommissiónin skal koma her upp, men eg segði, at hon kundi velja t. d. 3 menn og lata teir koma til Føroya; tí vil kommissiónin hava alsíðigt beskeð um føroysk viðurskiftir, so má hon koma hegar til Føroya, tað eru jú mangir menn heruppi, ið eru interesseraðir í sakini, og teir eiga at hoyrast, um kommissiónin skal fáa eitt rætt bilæti av henni.

J. Patursson: Tingmaðurin á Strondum tykist vera farin at leita sum eftir nál eftir separatismu hjá sjálvstýrismonnum. Eg vil biðja hann leita í sínum egna programmi. Har standur tvær reisur: det færoske Folk; tað kann ikki skiljast á annan hátt, enn at tað skal vera í mótsetning til hitt danska fólkið. Hatta er fallið soleiðis fyri, bæði fyri sambandsmonn og okkum, og hevur einki við separatismu at gera. Túið Andrass Sámalsson segði, at eg havi kallað justitsministaran ólukkudýr, so lati eg tað róliga standa, tí tingskrivarin hevur óivað skrivað bæði hvat eg sogði og hvat Andrass Sámalsson segði, tá hann kallaði státsministaran ólukkudýr.

Joen Poulsen: Vi kan sige det færoske Folk, fordi vi erkender en national forskel mellem Færinger og Danske, men vi hører statsretligt til Danmark og kan derfor ikke bruge saadanne Benævnelser, som Selvstyremændene har brugt i deres Skrivelse til Tinget.

A. Samuelsen: Eg skal siga til tingmannin á Tvøroyri, at táið hann segði, at oll kommissiónin nýttist ikki at koma hegar, so er tað, sjálvt um tað ikki verður talan um meira enn 3 menn, so nógv meira roks av teirra ferð hegar, enn um Edw. Mortensen fór til Kjøpinhavn, sum hann so ofta hevur gjørt fyrr; tað hevur jú ikki verið talað um at avhoyra fleiri Føroyingar enn hann. Hann hevur í dag givið eina grund fyri at hann ikki fer, sum hann ikki áður hevur nevnt, og trúgvi tað er hovuðsgrundin. Eg havi ikki kallað státsministaran ólukkudýr, men Jóannes Patursson hevur kallað hann ólukkudýr.

S. P. úr Konoy: Samuelsen segði í áðni, at tað varringt komið fram í teim donsku bløðunum um hvat ið var gingið fyri innan fyri

kommissiónina, og hann fanst at hesum. Her hevur Samuelsen eina støðu, ið er tvørtur ímóti teirri, hann hevði undir hini vestindisku kampagnini. Vit vita at tað var reiðiligt upplop í Danmark og at »Dinl.« var heilt forargað. Nú siggja vit at A. Samuelsen hevur skift sinnalag. Tí nú tekur hann sonn støðu sum áður H. Brandes. Veit A. Samuelsen um hann er í yvireinsstemmilsi við seg sjálvan ella veit hann tað ikki.

J. Patursson: A. Samuelsen sigir, at tað sum landstingsnevndin hevur at gera er at avhoyra Edw. Mortensen. Henda nevnd, sum situr fyri at granska mangar føroyskar sakir, kann hon fáa tær rættu upplýsingar við at avhoyra ein eittans mann? Her skal granskast um adressumálið og telegrammið og tá mugu væl teir forhoyrast, sum her hava verið uppi í leikinum, t. d. Framburðsfelagið, løgtingsmonnini og aðrir. Tað er tí skeivt at siga at landstingsnevndin einaus skal forhoyra ein mann.

A. Samuelsen: Konoy spyr um eg helt at J. Patursson hevur sagt ov nógv, tá hann hevur játtað ymiskt, sum framkomið er í bløðunum. Men Konoy helt at E. Brandes ikki skuldi siga nakað, sum var framkomið í eini kommissión, nevnliga Vestindiunevndini. Hetta, sum her er fyri, hevur tó einki við E. Brandes at gera. Man forhereiddi oyggjasølmna, utan at tað var komið fyri kommissiónina. Men Brandes noktaði fyri tí. Viðvíkjandi tí, sum framm er komið í bløðunum, nýttist J. Patursson ikki at svara antin ja ella nei. Hann kundi siga: Eg hvørki sigi ja ella nei. Tað upprit vit nú hava fingið av orðaskiftinum her í tinginum vil vísa, hvussu hann hevur uppfylt sína kommissiónsplikt. Konoy meinar at samanstilla H. Brandes og Patursson. Men Konoy veit lítið skil á Vestindiunevndini. — Patursson sigir, at eg havi sagt at bert E. Mortensen skal avhoyrast. Eg segði, at tað ikki hevur verið talan um at avhoyra aðrar enn E. Mortensen. J. Patursson veit, at um kommissiónin verður liðug áðrenn ríksdagurin verður liðugur, so vil kommissiónin upploysast.

Patursson: Tað tykist sum um A. Samuelsen veit betri at siga frá landstingsnevndini enn eg veit. Hann fortelur, at eingin annar Føroyingur er kravdur at koma niður enn E. Mortensen. So má onkur hava sagt tað fyri honum. Eg má hava lov at siga, at hesi boð, sum hann ber frá kommissiónini, ikki eru bein. Um kommissiónin ger so, ella ikki, veit eg ikki. Um tað sum stendur frágreitt í »Kr. Dagblad«, »København« og »Berlingske« viðvikjandi kommissiónini, so má eg væl hava loyvi at siga at tað ikki kann vera meining í at høgri- og vinstrimenn bera boð frá kommissiónini. Tí úr luftini kunnu hesi bløðini ikki hava fingið tíðindini. Eg fari tí at krevja at teir avhoyra hesi bløðini.

A. Samuelsen: Patursson hevur misskilt meg við vilja. Eg havi sagt, at einasti maður, sum kommissiónin hevur kravt niður og ikki hevur viljað komið, er E. Mortensen. Eg veit annars ikki hvat kommissiónin ger. Tá Patursson sigir, at høgri og vinstrimenn hava borið boð frá kommissiónini, so má eg protestera. Hetta hevur hann ongan rætt til at siga. Eg haldi ikki at teir hava verið indiskretir.

S. P. úr Konoy: Vit hava fyri opnum tingi fingið at vita at tað hevur verið í umbúnað boði at fáa Føroyingar niður og at landstingsnevndin skal koma higar upp. Tað er soleiðis nakað í tí, sum staðið hevur í donskum bløðum. Hetta er tann hoiskasta frukt, sum sambandið hevur borið okkum. Nú skulu vit altso fyri rættin. Eg skal ikki helma at arbeiða móti teimum, sum so vilja fara við okkum. Tað má vera meir enn vanliga gott tilfar í okkara fólki, um vit ikki allir verða separatistar við slíkum lagi. Norrøna søgan eigir einki tílíkt dømi at sýna framm. Á. Samuelsen kemur inn á deknaspurningar. Ja teir kalla jú A. Samuelsen fyri Andrass hjá deknunum. Og eg var eisini við at verða deknur, men sambandsmonn loysti meg frá tí. Eg veit ikki at deknurin plagar at rópa ja og nei. Men tað kann vera at so er siður norðuri í Vík.

A. Samuelsen: Eg segði, at eg helt at ein deknur mátti koma til tey orðini, at »talan skal vera ja og nei«. Men eg viðgangi, at soleiðis sum Konoy fataði tað, var tað fult so stuttligt. Hansara uppgáva tykist at vera at siga stuttligheitir og fáa tingmenninar at læa. At siga, at hvør maður nú kannske skal fyri politiskan rætt, er væl ikki beint. Annars kann hann takka E. Mortensen fyri tað, tí hann segði, at hann ikki vildi fara niður. Síðani vildi hann kunna takka teimum, sum krevja at landstingsnevndin skal koma til Føroya. Konoy vil skilja, at tað er ikki kommissiónsins skuld um møtast skal fyri politiskum rætti. Um menn fara niður at møta fyri kommissiónini

verða teir ivaleyst pent behandlaðir. Fr tað skomm at fara niður til hetta, má tað væl eisini vera skomm at fara niður aðrar sakir viðvíkjandi, t. d. til at tala um at fáa okkum landbúnaðarskúla.

Edw Mortensen: Nú sigir A. Samnelsen at um Føroyingar stevnast fyri politiskum rætti, so er skuldin mín. Eg kann ikki taka skuld fyri tær dumheitir, sum landstingsnevndin finnur uppá. Eg trúgvi ikki at Føroyingar vilja fara fyri politiskan rætt. Eg fari ikki. Vit eru ikki í Preusson.

A. Samuelsen: Allir forstanda, at eg segði, at atvoldin er tann, at mann hevur noktað at møta fyri landstingsnevndini. Eg haldi at E. Mortensen kann beganga dumheitir eins væl sum landstingsnevndin.

J. Patursson: Tá A. Samuelsen sigir, at atvoldin til at Føroyingar skulu møta fyri politiskum rætti er hon, at E. Mortensen ikki vildi møta í Keypmannahavn, so sigi eg at hetta er ikki sannheit.

A. Samuelsen: Eg segði, at um Føroyingar skulu møta, so er E. Mortensen skyldugur í tí; tó at eingin heiðurligur maður nýtist at raðast fyri at møta her.

Edw. Mortensen: Eg eri ikki pliktaður at møta her til politiskt forhoyr. Tað er A. Samuelsen, sum er skyld i, at landstingsnevndin er sett.

A. Samuelsen: Hvør, sum er skuld í tí, nýtast vit ikki at tala um í dag, men eg var við til at seta hesa nevnd, og og eri fegin um at hesir spurningar verða granskaðir av henni. Patursson ber ansvar fyri at vera farin inn í hesa nevnd, sum hann hevur funnist so nógv at. Hann skuldi mælt imóti at henda nevnd bleiv sett og sjálvur ikki farið í hana. Harvið hevur hann ansvar fyri henni. Eisini hevur tingmaðurin úr Kirkjubø eitt stórt ansvar fyri, at kommissiónin yvirhøvur er niðursett, tí hevði hann sagt soleiðis við sínar partífelagar, at Føroyingar sóu soleiðis uppá tað, vildu teir kanska ikki haft sett kommissiónina.

J. Patursson: Samuelsen royndi at sleppa sær undan við at siga, at um Føroyingar vilja nokta at fara fyri fútan, tí Edward Mortensen ikki er møttur fyri kommissiónini, so var tað við sama rætt, men hetta kann siettis ikki samanberast.

A. Samuelsen: Eg havi sjálvsagt ikki vitað so gott boskað um kommissiónina sum tingmaðurin í Kirkjubø, sum sjálvur er limur av henni, men so vítt eg veit, hava teir ið eru stevndir fyri kommissiónini plikt til at vitna fyri henni. Eg vil spyrja tingmannin í Kirkjubø, um tað er satt, at hann krevur, at Føroyingar í stórum tali skulu hoyrast av kommissiónini.

J. Patursson: Eg havi kraft, at vit skulu hava hoyrt vitnir á ástaðnum.

A. Samuelsen: Ja, tað havi eg hoyrt Jóannes Patursson siga, men tað hevur kommissiónin jú eisini gjørt. Teir hava avhoyrt sýslumann Effersøe, meg, landstingsmann Patursson, og teir hava vilja hoyrt Edw. Mortensen, men hann er ikki komin.

J. Patursson: Táið ikki bert Edw. Mortensen, men eisini ein stórur partur av Føroyingum er lagdur undir ilt, so kann tað ikki vera annað, onn at ein Føroyingur, ið kann gera nakað til tað, krevur vitnir avhoyrd heima í Føroyum fyri at fáa greiðu á sakini.

A. Samuelsen: Nú segði Jóannes Patursson nakað, ið er ein indiscretion, nevniliga, at nógvir Föroyingar eru lagdir undir ilt í kommissiónini. Eg havi hafe at gongd til at síggja, í hvussu er, hvussu ein partur av arbeiðinum í kommissiónini hevur verið og og benokti uppá tað kraftigasta, at ein stórur partur av Føroyingum er lagdur undir ilt í kommissiónini.

J. Patursson: Nú segði Samuelsen nakað ið má kallast ein indiscretión frá kommissiónsarbeiðinum. Eg havi ikki sagt annað enn hvat eg kann standa við.

A. Samuelsen: Jóannes Patursson segði, at ógviliga nógvir Føroyingar eru lagdir undir ilt í kommissiónini, og eg hopi at referatið vil vísa tað. Verða Føroyingar í stórum tali stevndir fyri kommissiónini, so eru sjálvstýrismenn ansvarligir harfyri.

J. Patursson: Andrass Sámalsson kann ikki gera okkum sjálvstýrismenn ansvarligar fyri hvat ið kommissiónin ger, tí hon er í sini djúpastu grund eitt sambandsblomstur og einki annað.

A. Samuelsen: Jóannes Patursson kann ikki koma utan um, at hann hevur sagt, at

ógviliga nógvir Føroyingar eru lagdir undir ilt í kommissiónini.

J. Patursson: Eg standi sjálvandi fast við hvørt einasta orð, eg havi sagt.

Fyri at velja eina millumtinganevnd uppá 3 limir góvu 11 tingmenn atkvøðu, eingin ímóti.

Sanatorilæknaembætið.

1. viðgerð.

S. P. úr Konoy: Tað ber so illa í lag hjá teirri nevnd, ið var sett viðvíkjandi virðurskiftum bróstsjúkhúsins, at formaðurin er sjúkur, men nevndin heldur tað kortini vera beinast at koma við einum uppskoti til tingið, nú tað er saman. Táið vit seinast vórn her, hevði læknin sagt seg frá, og tað hevur síðani ikki meldað seg meira enn ein, ið søkir plássið, nevniliga læknin í Sandoy. Sunnheitsstýrið hevur innstillað og fysikus við, at embætið verður uppaftur útbjóðað, so fleiri kunnu søkja. Alt hetta hevur ført til, at amtmaðurin frá læknanum í Sandoy hevur fingið telefontelegram um, at hann ikki vil søkja embætið. Tað er væntandi, at vit ikki kunnu fáa nakran lækna úr Danmørk utan at hæðka lønina. Táið vit frætta, at tingið vildi koma saman, vildu vit ikki taka støðu til lønhæðkingina, men lata alt tingið ráða í hesum.

Eg meini, at vit kunnu lata hetta koma til umrøðu í einari nevnd uppá 5 limir, og lata hana eisini kanna eftir, hvat ið skal gerast av umvølingum, og taka støðu til eitt krav um meira løn til frk. Flagstad.

O. Effersøe: Hr. Konoy omtalte noget, der laa en Del udenfor selve Sagen; jeg vil ogsaa omtale et Punkt, der ligger noget udenfor, nemlig Pengene. Har vi Penge til disse Lønforhøjelser? Overhovedet har jeg paa Fornemmelsen, at vi ikke kan klare alle Tingets Udgifter uden Optagelsen af et større Laan.

Samtykt varð at velja eina 5-manna-nevnd.

Fundur tisdag 28. januar.

Síðsta viðgerð viðvíkjandi hækkan av lønini til yvirlæraran við realskúlan.

O. Effersøe: Jeg fremkom med min Henvendelse til Tinget i Betragtning af den store Betydning, jeg tillægger Stillingen som Førstelærer og Forstander ved Seminariet, og fordi jeg følte mig urolig for Besættelsen af dette Embede. Sagen blev mødt paa følgende Maade. Provsten erklærede sig tilfreds. Fra anden Side blev jeg mødt med Spot og Forbitrelse. Mindretallet har ved sin Afstemning støttet min Henvendelse, medens Flertallet ikke stemte derfor. Derfor faldt mit Forslag, og dermed er Sagen afgjort og sluttet her i Tinget. Eftertiden maa dømme om, hvem der har set rigtig og har handlet rigtig. Nu ligger Ansvaret med Hensyn til Besættelsen af dette Embede i Hænderne paa vedkommende Autorite, som saa maa tage sin Beslutning.

Val av nevnd viðvíkjandi landstingsnevndini.

O. Effersøe: Da der ikke fra vor Side er fremsat Forslag om Valg af Medlemmer, saa maa Sagen afgøres efter Forretningsordenen.

J. Patursson: Tá sambandsmenn ikki hava sett nakran til hesa nevnd, vil eg biðja formannin taka sakina út av dagsordanum og leggja hana fram á einum øðrum fundi.

Formaðurin setti sakina til ein annan fund.

Studningur til arbeiðisbýsar fiskimenn.

1. viðgerð.

J. H. Poulsen: Um enn hetta er sak av ministoriellari beskaffenheit, so hava vit tó biðið um at seta ein fyrispurna til formannin sum amtmaður, við tað at nógv fólk fregnast eftir at fáa at vita hvussu vorðið er við hesum máli. Eg vil tí

spyrja um hvussu tað er við styrkinum, sum fiskimenninir skuldu fáa og um tað ikki skjótt kann ventast at verða útbetalt.

Formaðurin: Loven om arbejdsløse Fiskere blev vedtaget i Rigsdagen i Anledning af, at Tilstanden var særlig daarlig i Danmark. Som d'Herrer bekendt, behandlede Tinget Loven i sidste Samling, om den skulde gælde for Færøerne. Lagtingets Indstilling blev ekspederet paa sædvanlig Maade. Imidlertid har Ministeriet udtalt, at det billiger, at der ikke er udbetalt noget.

J. H. Poulsen: Sum eg skilji formannin, so hevur ministeriið resolverað at einki enn verður at útbetala til føroyskar fiskimenn. Men dýrtíðarhjálpin er útbýtt til danskar fiskarar, tó at teir eftir statistikkini hava staðið betri fyri í peningi enn føroyskir fiskarar. Í 1916 vunnu miðal føroyskir fiskimenn knappar 1300 kr., meðan danskir vunnu 3 650 kr. Í 1917 føroyskir 1140 kr., danskir 2280.

Eftir donskum statistikki høvdu danskir fiskimenn yvirhøvur roknað í 1916 eina inntøku uppá 3 660 kr. um árið, í 1917 høvdu teir 2 280 kr. Í teim sonu árum høvdu føroyskir fiskimenn o. u. 1 300 kr. í 1916 og o. u. 1 140 kr. í 1916. Eg veit ikki um nakar føroyskur statistikkur fyrilá, men eg veit at føroyskir fiskimenn fingu ongan stoðning, meðan danskir fiskimenn, ið høvdu eina inntøku, ið var meira enn tað dupulta av teirra, fingu stóran styrk. Tingið eigur at styðja sakina og rætta henvendilsi til ríkisstýrið. Føroyskir fiskimenn eiga at fáa stuðning eins væl og danskir. Eg skal loyva mær at fyrisláa, at sakin fer í nevnd.

A. Samuelsen: Eftirsum honda sak er komin fram á tiug við hesum upplýsingum, eri eg glaður við, at hon er komin fram. Eg havi í sínari tíð spurt um, hvussuleiðis man vildi seta hesa lóg í verk, og var tað svarað mær, at tað í Føroyum var yvirdrigið til Færø Amt, í Danmark til ministaran. Amtið upplýsir nú, at einki er útbetalt, men at tað fyriliggur approbatión harfyri frá ministerinum. Tað er rímiligt, at summir einki fáa, tað eru kanska nógvir fiskarar, ið hava tjent væl, men eisini nógvir, ið trongja til stuðning. Tað trúðu eisini teir føroysku ríksdagsmenn, at lógin kom til at galda fyri Føroyar. Eg vil slutta meg til J. H. Poulsen og anbefalla, at vit gera ein innstilling. Danskir fiskarar hava kanska fingið meira, enn teir áttu, men føroyskir hava so aftursyri fingið nógv ov lítið.

O Effersøe: Det er alle Medlemmerne af vort Parti, som vil slutte sig til en Beluudling i Udvalg. Det galdar om at undersøge Forholdene paa rette Maade og fremskaffe statistiske Oplysninger, og jeg vil derfor henstille, at man undersøger Forholdene ombyggeligt. Der kan være stor Forskel paa den samlede Fortjeneste og alligevel kan den enkelte Fiskers Udbytte være det samme. Har maaske den samlede Fortjeneste et Aar været 2 Mill. Kr., et andet Aar 6 Mill. Kr., men saa Salt og andet været saa meget dyrere det sidste Aar, vil den enkelte Fiskers Fortjeneste ikke vokse i samme Forhold. Men her kommer det an paa at vide den enkelte Fiskers Aarsindtægt.

M. A. Winther: Ein verður so gott sum dagliga spurdur av fiskimonnum um hvat hatta hevði uppá seg, sum varð teimum lovað, mangir hava til doils livað uppá tað, og sjálvt um væl hevur verið fiskað í Føroyum tað seinasta árið, so er tann almenna dýrtíðin komin føroyskum fiskimonnum líka meint við sum øðrum. Um danskir fiskimenn hava fingið studning útbetaldan, so eiga føroyskir fiskimenn eisini at fáa hana, tí teir hava kanska ikki so góð kor sum fiskimenn í Danmørk. Fiskimenninir har niðri høvdu í 1917 dupulta inntøku av tí, føroyskir fiskimenn høvdu, so eg haldi hesir hava fullan rætt til studning. Eg vil minna representantar okkara niðri í Danmork á at arbeiða dúliga fyri hesum. Samfundið sum heild kann saktans unna tí arbeiðandi manni alla ta meirvinning, hann kann fáa nú undir krígnum, tí teir hava hatt gott brúk fyri hvørjum oyra og gjøgnumgangandi er fortjenastan hjá fiskimonnum lítil. Eg vil spyrja, um spyrjublaðini, ið eru útsend íljor, eru av sama slag sum tey, ið eru nýtt niðri í Danmørk. Eg havi hoyrt, at tey ikki eru tað, og tað er skeivt, um tað er hetta, ið ger, at teir føroysku fiskimenn ikki hava fingið studning. Nú forútsetti man, táið lógin var gjørd, at fiskiskapurin kundi ikki fáa so góð kor sum áðrinn kríggið, við at tilfar var farið at tróta, petroleum o. a. Ein føroyskur fiskimaður kann ikki so gott skjóta seg inn undir tilfarstrot, hvat ið petroleum viðvíkur, sjálvt um tað hevur verið merkt, man mesta grundin til ringan vinning av sjónum í Føroyum hevur verið óvandaliga ringt

veður. Tað átti tó ikki at verið tikin slík smáhensýn, sakin átti altíð at fyriligið eitt sindur annarleiðis fyri føroyskar fiskimenn, og tað var val eisini skeivt, at vit ikki, tá lógin var her til umrøli, tosaðu um, um hon nú eisini hóskaði her, men táið vit ikki gjørdu tað, skyldaðist tað úttalilsir frá hinum táverandi formanni. Tað er ein harður kampur fyri lívið, føroyskir fiskimenn føra, og serliga tair, ið hava familju, trongja mangir nógv til studning.

J. H. Poulsen: Eg skal fyrisláa eina nevnd uppá 5 limir. Effersøe framdró, at man átti at bolýsa sakina so nógv sum møguligt, tað er sjálvsagt beint, og tað er gott at vita, hvat hvør maður hevur fortjent, men eitt annað er hvussu nógv hesin peningur hevur givið út, t. v. s. hvussu livifóturin hevur verið og hvat prísarnir á neyðsynjarvøru hava verið í teirri tíðini.

A. Samuelsen: So vítt eg havi fingið upplýst um framgangsmátan niðri í Danmark, so tók man tey andragandir, ið komu inn frá fiskarum, og tey komu vist ígjøgnum Fiskeriforeningen, og behandlaði tey, og tað er tað, eg haldi vit skulu gera her við, vit skulu taka líka nógv hensýn til fiskarar, ið búgva í Føroya amti sum niðri í Danmark. Nú meini eg ikki, at øll andragandir ið koma inn kunnu bevilgast, tí lógin hóskaði ikki heilt, men at eingin kundi fáa nakað, tað var skeivt. Tað kann gott vera, at fiskarar her uppi tað seinasta árið hava tjent yvirhøvur væl, og kanska onkur kundi haft verið eitt sindur meira sparin, men hvussu var niðri í Danmark? Har tjentu fiskararnir ovurhonds nógv, men man sogði kortini ikki við teir vestjútsku fiskararnar, at teir kundu hava verið meira økonomiskir; tá teir komu og søgdu, at teir trongdu til studning, so fingu teir hann. M. A. Winther segði, at vit áttu at hava gjørt nakað í fjør, tá ein fyrispurningur herum var gjørdur til okkara: nei, tað kundu vit ikki, tí tá var lógin longu gjørd. Eg hugsaði sjálvur um, at tað hevði verið gott, um vit kundu fingið lógina broytta, men tá var man longu farin at hugsa um í ríkisdegnum, at ræsurnar fyri studning skuldu gerast trengri.

Eg kann sjálvsagt altíð gera fyrispurning í ríkisdegnum, um hví lógin ikki hevur virkað í Føroyum, men fáa vit eina innstilling frá løgtinginum, er ein slíkur fyrispurningur ikki neyðugur. Eg hevði væntað at administratiónin hevði ordnað hesa sak men tað sær ikki út til, at nakað skal koma burtur úr.

Joen Poulsen: Jeg vilde gerne rette en Forespørgsel til Amtmanden. Jeg ved, at der er mange af Forstanderskaberne, der staar i ret bundløs Gæld for udlagt Dyrtidshjælp, men det gaar meget smaat med Refusionen. Kommunerne har faaet Forskud for Finansaaret 1916—17, men for Finansaaret 17—18 er der ikke kommet noget. Jeg vil blot spørge Amtmanden, om han kan oplyse, hvornaar der kan ventes Refusion, for Forstanderskaberne mange Steder staar ret daarligt i det.

S. P. úr Konoy: Fiskimenn yvirhøvur kenna seg lumpaðar við hesum, ikki bert tí teir vita, at danskir fiskimenn hava fingið studning og teir ongan, hóast teir hava verið fult berettigaðir til tess, men eisini tí, at tann lógin, ið var gjørd um statshjálp til reiðarar til útlúgving, heldur ikki er komin í lag. Kontraktin ífjør var vánalig, men reiðararnir lovaðu, at táið teir høvdu fingið útreiðslur teirra dekkaðar, skuldu fiskimennirnir fáa teirra andeil í studninginum. Fiskimennirnir spyrja nú, um reiðararnir hava fingið státshjálp, tí so vítt mær kunnugt hava teir einki fingið. Hesar tvær lógir væntaðu fiskimennirnir sær nakað av, og hvorgarri er komið nakað burtur úr.

Formaðurin: Til Hr. Poulsen vil jeg sige, at jeg vil gøre alt for at faa de forskellige Refusioner bragt i Orden saa hurtig som muligt. Til Hr. Konoy vil jeg sige, at de to Love, han omtalte, behandler saa ensartede Forhold, at det er naturligt, at Udvalget faar begge til Behandling.

Fundu miðvikudag 29 januar.

Keyp av dampskipi.

2. viðgerð.

M. A. Winther: Tað er sjálvandi, at tað ræður um at fáa sakina sum skjótast úr londum greidda, so tingsetan ikki skal leingjast meira enn neyðugt. Sakin er komin aftur úr nevnd í morgun, og vit hava ikki haft stundir til at fáa nakrar avskriftir av nevndarálitinum, so tað er væntandi, at ikki allir tingmenn hava kunnað

fingið sæð tað, men eg vóni at vit fáa fleiri avskriftir í dag, so allir tingmenn kunnu seta seg gjølla inn í sakina. Hetta mál liggur soleiðis fyri, at nevndin fyri skipafelagið Føroyar hevur sent skrivilsi til tingið um studning til keyp av farmaskipi í Hálandi; hetta gjørdi, at nakrir tingmenn tóku seg saman og bóðu amtmannin kalla inn til tings. Eg fasthaldi, at tað var atvoldin til at tingið kom saman; tað var atvoldin fyri meg og óivað fyri allar teir, ið hava kallað tingið saman.

Nevndin hevur býtt seg í eitt fleirtal og eitt minnital, sjálvstýrismenn og sambandsmenn. Minnitalsuppskotið broytir nakað av frá fleirtalsins uppskoti, tó ikki meir enn væntandi er, at vit kunnu semjast um at fáa eitt gott úrslit úr hesi sak. Báðir partar halda, at tingið skal styðja hesa fyritøku. Teir menn, ið hava stovnað hana, siga frá, at lutapeningurin nú er teknaður fram ímóti 200 000 kr. og teir vóna, at hann skjótt verður ¼ million. Nú biðja teir tingið hjálpa teimum við einari kvart million og til at fáa eitt lán uppá 800 000 kr. til keyp av einum tilskilaðum eimskipi. Hetta skipið, sum teir siga seg at hava uppá hondina er eitt eimskip uppá 1 000 tons dw. og prísurin er 730 norskar kr. fyri tonnið. Tað skuldi altso kostað 730 000 norskar krónur. Nú er um hetta tíðaroilið ein lítil munur á donskum krónum og norskum, so mikið, at eftir hvat ið upplýsist á posthúsinum, vilja 730 000 norskar krónur vera verdar 770 000 danskar.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at tingið hevur haft hetta mál til umrøðu, og tingmennirnir hava altíð tikið við vælvild móti hesum. Fyrstu ferð, vit høvdu hetta á máli, var talan um at keypa fleiri seglskip, men keypið kom ikki ílag. Seinni var so talan um at keypa eitt danskt eimskip, ið sigldi millum Onglond og Frankaríki; tingið játtaði at styðja keypinum, um eimskipið var hóskandi fyri atlantshavssigling. Eg skal loyva mær at lesa hvat tingið samtykti ífjør: »at vørunevndin og amtmaðurin á tingsins vegna eftir felagsráðgerð við farmaskipafelagið fær heimilt til at veita fyritøkuni, um tað nýtist áðrenn tingið kemur saman aftur, eina hóskandi peningastudning, annaðhvørt sum lutapening ella lán, tó í lutapeningi ikki meira enn 250,000 kr. og í láni til felagið ikki meira enn 250,000 kr., alt undir teimum treytum, at tað verður keypt eitt skip (dampskip), minst 800 tons, og at lutapeningur felagsins er teknaður uppí minst 500,000 kr.« Táið tingið á Ólavsøku ífjør hevði hetta til umræli, hevði skipafelagið teknað í lutapeningi 120,000 kr. Tað var mest teknað í smáportum uppá 25 kr., 50 kr., 100 kr., teknað yvir allar Føroyar. Tað skal nógv til av slíkum smápeningi til at geva 120,000 kr. Tað sást tá, at ikki var teknað nógv av forrudningum í Føroyum og tað er tað heldur ikki nú. Sjálvsagt, tað vóru harðar treytir tingið setti á ta ferð: um tit tekna eina hálva millión, hjálpir tingið við aðrari hálvari. Sær ein uppá innskotini í bankanum og sparikassanum vildi tað ikki verið óyvirkomiligt at tekna eina hálva millión her í Føroyum, men ein veit so nógv, at eingin tekur so nógv upp av sínum ogn fyri at stovna nýggjar fyritøkur, at hann stendur eftir á berum. Fyri Føroyingar eru kortini ½ millión nógvur peningur. Vit hildu, at telefonin var ein stór fyritøku, men tað var einki móti hesum. Skipafelags nevndin hevur kortini viljað teknað pening aftur, men hin spanska sjúkan hevur forðað, síðani hava teir byrjað aftur og nú er 130 000 kr. aftrat, altso ialt 250 000 kr. Tað er aftur smápeningur, onkur einstakur teknar 2000 kr., tað eru smáfólk, ið geva mest, og tey, ið geva henda smápening, eru tíðan fólk, ið geva tað seinasta, tey eiga. Henda sak er væl undirtikin av almenningi í Føroyum. Í summum bygdum er tað næstan hvør menniskja ið hevur teknað, í vón um at verða ánari av tí skipi, ella teim skipum, ið vit væntа at fáa til landa, bæði fyri at spara frakt, men eisini av arukenslu, fyri at vit kunnu mennast við at siggja, at vit sjálvi kunnu fara undir hesa fyritøku.

Eg siggi hetta bæði sum eina fyritøku, ið fer at bera seg væl, og sum eina mogulighoit fyri at fara undir nýggjar fyritøkur í Føroyum. Tað er ikki innkomið nógv av peninginum enn, men eg roknі við, at tarvum alt, ið teknað er, vil ganga inn. Eg meini, at tað hevur nimmi at týða, um vit í hesi stund kunnu vísa á eitt ávíst eimskip at keypa, men meira, at vit kunnu fáa eitt skip, ið er hóskandi á allan hátt. Tað, ið sigst um hetta skipið, er nakað lítið, so vit hava ikki kunna kent okkum heilt vísar í, um hetta eimskipið nú eisini er heilt hóskandi til at sigla í slíkum farti sum heðani til Spanialands og suður á Miðalhavið. Hetta skipið, ið her er tala um, vil sagnandi kunna lasta o. u. 7—800 tons av koli. Um tað kann nýtast til at føra last av kliptiski vita vit ikki enn, um vit kanska kunnu vænta tað.

Nevndin er samsint í, at skulu vit keypa farmaskip til Atlantshavsfart, mugu vit

vera vissir í at skipið er skikkað til slíkan fart. Her mugu vit vera forsigtigir. Annars kann fyritøkan missaydnast. Tað kann spyrjast: Er tíðin lagalig nú til at keypa skip? Tað er ikki so gott at svara á slíkan spurning; alt er jú nú í tí óvissa. Skipaprisurin fellur eitt sindur nú, og fraktin fellur eisini. Hetta kann týða á at tað er vanskiligt at keypa skip. Men kann eisini týða, at tað er lagaligt at keypa. Tá skipasiglingin verður heilt frí, verður vitiligt stórt trot á tonnage — nógvur eftirspurningur um skiparúm. Vit hava verið so haldigir at hava haft skonnartir sigландi her í hesi tíðini. Men maunu ber fara at siggjast aftur aftaná at friðurin er komin? — Nevndin hevur spurt seg fyri um ein slíkan dampara, sum kann ganga hiðani til onnur lond í farmasigling. Ti vit ætla ikki at troðka tey skip út sum nu ganga í festum ferðum higar. Ætlanin er at lata tær rutir vera og fáa farmasigling til tey lond, sum vit hava tilfeldugar ferðir frá; t. d. sigla eftir koli og salti. Eitt guvuskip á 800 tons er nóg lítið til at fora okkum salt og kol og eisini nóg lítið til at sigla við fiskafarmi úr Føroyum. Man kann rokna við at ein slíkur bátur verður nógv nýttur av okkara keypmonnum, og tá skuldi hetta verið ein rentabil fyritøka. Tað er ein tinglimur, sum ikki trýr tað. Tað er kanske verst fyri hann sjálvan. — Tingið hevur áður tikið væl við hesi sak av tí, at sakin er so væl undirtikin av fólki okkara. Tingið hevur styðjað hana til hendan dag. Tað hevði heldur ikki verið gott at fáa hana á gongd utan at tað offentliga styðjaði. Vit hava ikki so nógv av pengamonnum við stórum avlopspeningi. Vit noyðast altíð at líta á at tað offentliga hjálpir, tá størri fyritøkur eru frammi. Men afturfyri at vit vilja styðja er tað natúrligt at vit ynskja at hava nakað at siga skipakeypinum og administratiónini viðvíkjandi. Tað er rímiligt at tingið fyri sítt innskot av peningi fær loyvi at velja ein vissan part av tí nevnd, sum skal greiða hesa sak, tó at tingið ikki skal taka eina herskandi støðu í nevndini. Vit, meginparturin í nevndini, halda, at vit ikki eiga at forða fyri at henda sak skjótt verður gjøgnumført við at tingið heldur fast við ta fyritøku, sum gjørd var í 1918. Vit vilja broyta tann form, íð tá var gjørdur. Vit siga tí, at vit vilja skjóta upp at tingið letur sítt peninga-inskot og so fer skipafelagið at syrgja fyri restini. Vit skjóta upp, at tingið letur 350 000 kr. sum sín part. Og vit seta tær treytir at skipið, sum verður keypt, ikki lastar undir 7 000 tons — at tingið velur mann til at ansa eftir at skipið egnar seg til tað, sum tað skal nýtast til. Vit eiga ikki í logtingskössunum so miklan pening; men mugu taka lán til hetta. Og tað lánið fáa vit lættliga, t. d. úr kreditforeiningini í Keypmannahavn. Tá tað kann antast at hetta lánið verður neyðugt at nýta, áðrenn tingið kemur saman aftur, hava vit skotið upp at amtmaðurin upptekur lánið á tingsins vegna. Viðvíkjandi val af nevnd og val av representantum, tá skipið skal eftirhyggjast, so halda vit at tað skal vera amtmaðurin og vørunevndin á tingsins vegna. Eg skal vegna meginpartsins anbefalla uppskotið og fyrisláa, at sakin fer til 3. viðgerð.

O. Effersøe: Efter at denne Samling er indkaldt, er den Beslutning, som Tinget tog i sidste Samling angaaende denne Sag, bortfaldet. Saaledes som Sagen foreligger nu, maa det være Tingets Opgave at overveje den meget nøje. Vi kan ikke tage Sagen agitatorisk og blot se dens Lyspunkter. Da det er offentlige Midler her er Tale om, maa vi se tilpas kritisk paa Sagen. Sidst forelaa Situationen saaledes, at man maatte faa et Skib for at hjælpe paa Tilførselen til Øerne. Men i Mellemtiden er det sket, at Krigen er ophørt. Det kan være, at der i en nær Fremtid vil blive Knaphed paa Tonnage. Om vi kan skaffe Skib til rimelig Pris, vil vi vel nok kunne tjene paa det. Ét andet er, at det kan komme til at virke gavnligt, at vi selv ejer Skib. Forresten vil det afhænge af mange Omstændigheder, hvorvidt et saadant Foretagende kan komme til at betale sig. Det er jo risikable Tider, vi lever i. Og vi ved ikke meget om, hvad Fremtiden vil bringe. Et vigtigt Spørgsmaal er, om vi kan købe fordelagtigt. Der foreligger endnu intet Tilbud om Salg af Skib, som kan tillægges Betydning. Det eneste Tilbud, som foreligger, synes ikke fordelagtigt, og Skibet synes ikke at egne sig til den paatænkte Fart, ikke til Atlanterhavsfart, og ikke til at føre større Fiskelaster. — Naar der blev talt om Anledningen til Tingets Sammenkaldelse, saa er den offentlige Anledning den, at der skal købes et saadant Skib. Jeg skal ellers ikke give mig til at granske Hjærter og Nyrer med Hensyn til Anledningen til Tingets Sammenkaldelse. — Her er altsaa Risiko forbunden ved at købe Skib. Og naar Spørgsmaalet bliver, om vi skal give nogen bestemt Bemyndigelse til at købe Skib, saa er Sagen endnu vanskeligere.

Medens Mindretallet vil se bort fra forskellige Vanskeligheder, her man ikke kunnet se bort fra den sidste Vanskelighed, at overdrage til nogen bestemt at købe Skib. Af andre Vanskeligheder er den, at der ikke er nogen Mand, man kender, som kan lede Selskabet, ingen, som har Tillid til, at han kan drive det. Vi har som Følge af vort hele Syn paa Sagen ment, at vi, efter at der er vist Sagen Interesse fra saa mange Sider, vil i al Almindelighed gaa med til, at man fra Lagtingets Side skal støtte Købet af et Skib for færøsk Regning. Det er et Spørgsmaal, om det er klogt, for Øjeblikket at sætte Penge i et Dampskibsselskab, og om vi ikke heller skulde sætte den i Fiskeriforetagender. Men man vil maaske komme til det, at vi kan sætte dem i begge Dele. Jeg vil fastholde, at det maa ligge i Lagtingets Haand at foretage Købet. Der er ikke megen Forskel i Flertallets og Mindretallets Forslag. Uenigheden er denne: Er vi i Øjeblikket saaledes stillede, at vi kan foretage Købet paa rette Maade, og vi er uenige om, hvad vi skal kræve af den private Kapital. Flertallet mener, at den Aktiekapital, som allerede er tegnet, er tilstrækkelig. I saa Tilfælde vil man give et Tilskud paa 350 000 Kr. De Oplysninger, der foreligger om Tegningen, er meget usikre, det er maaske ikke alle Pengene, der kommer ind; i hvert Fald, vi vil ikke give Tilskud, før der er tegnet et Beløb paa 350 000 Kr. fra privat Side. Hvorledes vi skal skaffe Pengene, vil der altid senere kunne tages en Bestemmelse om. Hr. Winther nævnede, at Sagen fremmedes med ekstraordinær Hast. Og det har bl. a. ogsaa vist sig i, at Oplysningerne vedrørende Sagen har været ret mangelfulde. Naar det i Flertallets Betænkning siges, at Skibet vil kunne gaa med fuld Last af Fisk tilbage igen, saa mener Mindretallet, at dette ikke altid vil være Tilfældet, det vil vistnok ikke altid lykkes os at faa fuld Last begge Veje, da Skibet ikke altid vil være disponibelt heroppe, naar det passer Købmændene i Spanien at faa en Ladning, og de vil derfor ofte staa sig ved at bruge andre Skibe. I Princippet er vi enige med Flertallet, men paa enkelte Punkter uenige. Jeg vil derfor anbefale Mindretallets Forslag.

Poul Nielsen: Eg var ein av teimum, ið stemmaði fyri, at vørunevndin skuldi lata ein vissan pening til studning av keyp av einum føroyskum farmaskipi. Nú eru onnur viðurskifti, kríggið er endað, men eg havi enn ta hugsan, at hetta er ómein uti-

liga viktug sak fyri okkum at fáa í lag. Eg meini, at tað vil hava stóran týdning fyri okkum, um vit við egnum skipum kunnu fáa tað kol og salt til landa, sum vit skulu nýta. Eg havi lurtað vel eftir báðum ordførarunum, men við tað, at og ikki havi sæð nevndarálitið, er tað ikki lætt at vita allar einkultheitir, so eg vil biðja um, at vit sum skjótast fáa tær vanligu avskriftir. Tað er ein spurningur um vit ikki standa okkum við at bíða, ella um henda tíð er tann besta til at keypa skip. Eftir hvat ið frættist úr London fyri einari viku síðuni, hevur hitt enskska ministerium gjort av, at øll ensksk skipaverftir kunna taka sær uppá at gera arbeiði fyri útlandið, og skip ið eru yvir 15 ára gomul skulu nú kunna seljast til útlanda. So eg haldi, at tað kanska var best at bíða og síggja hvussu hesi forhold vilja stilla seg í útlondum. Um skipið verður keypt 2 mánaðir fyrr ella seinni ger einki.

R. Nielsen: Tað er hildið fram, at munurin millum uppskotini er so lítil og tað er tí vónandi, at báðir partar kunnu einast um at stemma fyri tí uppskoti, ið verður tað seinasta, um tað fyrra ikki gongur igjognum, ikki er stórur munur á teimum. Uppskotini eru eins í tí, at tað er ein eins stórur summur, 350 000 kr., ið løgtingið skal geva í studning. Minnitalið vil, at skipafelagið skal hava teknað annað slíkt, áðrenn man fer at keypa skip. Fleirtalið vil bevilga 350 000 kr. og so lata skipafelagið fáa frían leandur, tað kann jú eisini hava til fylgis, at teknингin mennist meira. Í fjor gjordi tingið av at geva studning uppá 250 000 kr. og útvega lán eins stórt. Tað var ein forútsøting tá hjá mongum tingmonnum, at tingið skuldi koma saman áðrenn nakað endiliga varð avgjort. Eg haldi, at tað er so vorðið nú, at fleirtal og minnital standa hvørt yvir fyri øðrum nakað á sama hátt, tó er ein framgongd í støðuni hjá fleirtalinum, meðan minnitalið hevur sama støðu nú, sum løgtingið hevði ífjor. Fleirtalið vil nu gera tað møguligt fyri skipafelagið at handla, meðan løgtingið fær kontrollerandi innflydelsi, minnitalið vil ikki lata skipafelagið handla uttan løgtingsins samtykki. Um hetta er tann rætta tíð til at keypa skip, er kanska ringt at dema um hjá okkum, men menn ið eru uttan fyri tingið og hava skil á hesum, halda nógvir, at tað nú er tann rætta tíðin. Tann peningur, sum løgtingið lovar at skjóta til, er minni nú enn ífjor, men hetta uppvigast við at skipafelagið fær friheit til at handla við

tað sama; so eg haldi, at tað er meira konsekvens í fleirtalsins áliti og mæli og tí til at styðja tað.

M. A. Winther: Eg vil til hr. Effersøe siga, at hann sagði, at ein maður ið var uttanfyri tingið og var interesseraður í sakini, behandlaði hana meira agitatorisk, enn vit her innan fyri tingið. Eg trúgvi, at tað verður til frama fyri sakina at hava ein mann til at agitera fyri henni, sum trýr uppá hana. Eg trúgvi sjálvur at hetta er ein sak vit eiga at styðja, eg havi absolutta trúgv uppá at hon fer at ganga. Um nakað skal gerast í hesi sak og minnitalsins uppskot verður viðtikið, má løgtingið altið vera tilreiðar til eina tingsetu. Teir menn, ið koma at sita sum nevnd í hesum skipafelagi, vera menn, ið hava nógv meira skil á hesum enn vit, og sum nógv meira enn vit vilja viga alt fyri og ímóti, so eg haldi, at vit eiga at geva teimum uppí hendur tað víðari arbeiði við hesari sak. Latum okkum ganga við, at teir klókaru mennirnir í mongum viðurskiftum eru menn utanfyri tingið. Effersøe og Poul Niclasen meintu, at táið vit ífjør viðtóku nakað, so var veraldarkríggið, ið gjørdi tað, men eru tað ikki nógv betri líkindir nú til at stuðla fyritøkur enn tá, tá eitt sovorðið haft lá á øllum, so hatta kann ikki nýtast til at bera bøtuflaka fyri teirri støðu, ein hevði ífjør. Kundu vit siga soleiðis ífjør, so kunnu vit siga tað so nógv betri í ár. Eg haldi at okkara uppskot er so nógv betri enn minnitalsins.

A. Samuelsen: Eg eri ikki væl tilfriðs hvørki við fleirtalsins uppskot ella minnitalsins. Tá vit í tí farna árinum hava forhandla um og hava stillað okkum vælviljuga með hensyn til keyp av farmaskipi, so var tað sætt sum ein væruforsýningsforretningur og ikki sum reiðarí. Tað var tá fyri at bøta uppá manglandi tonnage, og tá kundi tað forsvarast at gera tað, um ikki tað loysti seg sum reiðariforretningur. Tað kann vera gott um Føroyar eiga dampskip. Men eg haldi ikki at Føroya amtskommuna hevur ráð at ofra 350 000 kr. til hetta utan so skuldi vera, at vit annars ikki kundi fáa varur. Vit kunnu upptaka, sigir fleirtalsorðføreren, lán í kreditforeiningum i Danmark ella aðrastaðnis. Men tað er ein lættsindugur forretningur. Vit skulu taka lán uppá lán og soleiðis svekja okkara evnir. Skulu vit taka slíkt lán til amtsrepartitiónsfondin, so vil væl enkur halda, at hetta er ein nakað vágin fyritoka. Eg havi talað við menn, sum standa fyri reiðariforretningi, og teir meina at vit standa fyri eini niðurgangstíð. Eg vóni at teir, sum hava teikna seg fyri aktiur, hava teikna seg tí teir halda at hetta er ein góð sak, sum eigir at styðjast, og gongur tað illa, so hava teir ráð at missa peningarnar. Men vil tingið kunna siga tað sama? Skuldi hesin peningurin nýtast til hvalastingarar ella trolarar, so vildi eg vera við. Eg veit ikki um tað er roynt at fáa allan peningin frá privatum. Eg kundi her hugsa mær sparikassan og banken. Er tað roynt? Er tað rætt við tí nationala endamálinum og tí forretningsmessugu sakini, tá átti bankin at teikna seg fyri storri beløp. Og viðvíkjandi tað formella kann sigast, at tað í eini aðrari sak er søkt um driftslán, men er avsligið. Her skuldi man styðja, og her var talan bert um eitt minni beløp. — Tað er mangt sum skal setast í verk í Føroyum. Og nógvar sakir eru í unbúnað. Tingið hevur lænt 300 000 kr. her framman undan. Vit hava bevilgað 100 000 kr. til vegir. Og til hospitalið skal amtskommunan geva 100 000 kr. Og nú er her talan um 350 000 kr. Tað er 800 000 kr. tilsamans. Og keypa vit Smiril, so eru vit omanfyri millióninna. Tola vit slíkt lán? Og vit eru ikki liðugir at seta fyritokur í lag. Tað er ikki gott at vit koma at standa so, at vit hava stórar offentligar utreiðslur, men ikki skatteeyrir sum svara hartil. Nógv av Føroya fólki og nógvir av tingmonnunum hava hug at vera við. Man følir seg tiltalaðan av at vit kunnu koma at eiga eitt vakurt skip. Og man vil helst síggja ta ljósu síðuna við eini tílíkari fyritøku. Men eg havi eisini hugt at ranguni. Man hevur peikað á at Íslendingar hava keypt sær farmaskip. Men vit hava ikki ráð til tað, og vit nevðast ikki til tað. Nú er tað ein rúmdara virksomheit. Vit kunnu ikki vera vissir í at okkara forretningsmenn — utan teir, sum eru bundnir til hetta partafelagið — vilja taka frakt við tí skipi, sum vit fáa okkum. Teir vilja taka frakt hvar sum teir fáa tað bíligast og lagaligast. Hava okkara keypmenn og reiðarar pliktað seg til at taka frakt við hesum skipi, so kundi tað vera. Men teir eru ikki bundnir. Nakað annað er um man heldur at tingið skal halda framm við væruforsýningini, eftir at kríggið er endað. Tá hevur man brúk fyri skipinum. Men eg veit ikki um tað er ætlanin at halda framm. — Um fraktirnar ganga niður, so verður hetta ikki nakar lønandi forretningur. Viðvíkjandi um tíðin til at keypa er lagalig'

so kann fyrst sigast, at hevdu vit keypt ífjør, so hevdu vit givið 950 000 kr. fyri eitt gamalt skip. — Øll verðin væntar fallandi fraktir. Og tað tykist fyri mær at vera eitt ólagaligt tíðarpunkt at koypa skip nú. — Um hvussu tingið er samankallað — eg skal ikki koma inn úppá tað. Men eitt enn um skipakeypið: Tá tingið heldur, at tað hevur ráð til slíka fyritøku, tá verður tað vanskiligt fyri tingið seinni, tá størri sakir koma at fyriliggja, sum vit skula styðja. Tá verða vit ikki førir fyri tað, men noyðast at siga: Lat statin taka tað. Men tá vit disponera óforntftigt, so kunnu vit ikki altíð vænta at statsins skal vera strøks við hondina til at styðja. Tað er ikki tí, at eg vil leggja hesi sak hindringar í vegin. Eg skal vera fegin um tað vísir seg, at nan her er á røttum veg og ynskja lukku á ferðini. Men tá nín spádómur gongur út, vil eg loyva mær at peika á, hvat eg her havi sagt.

J. Patursson: Í hesum máli hevur Føroyafólk tikið so óvanliga djúpt í lumman. Eingin sak hevur í míni tíð verið so væl borin á hondum sum henda.

Um tað Føroya løgting skal taka ta støðu, at hettar dettur niður fyri, og tað kann tað altíð koma til, um minnitalsins uppskot verður samtykt, so haldi eg, at hetta er óhøtandi skaði. Her má annaðhvørt sigast ja ella nei.

O. Effersøe: Jeg indser fuldt ud Betydningen af de Bemærkninger, A. Samuelsen udtalte i Dag. Jeg har ogsaa stillet disse Synspunkter frem for mig og har tillagt dem en vis Vægt. Naar jeg dosuagtet gaar med til Mindretallets Forslag, saa er det fordi jeg netop ikke vil lade Sagen ud af Lagtingets Haand, for at det kan tage Ansvaret, naar Sagen engang kommer til endelig Afgørelse. Der er jo den Mulighed, at vi kan komme til at tabe disse Penge. Man har fra en vis Side hørt saa megen Kritik af vor økonomiske Stilling i Øjeblikket. Naar jeg i det hele taget kan gaa med til at optage Laan til dette Foretagende, saa er det fordi jeg ikke mener, at Situationen er saa slet, skønt den i den sidste Tid er blevet meget forringet. D'Hrr. kan jo spørge vor Hovedkasserer, Landfogden, derom. Poul Nielsen mente, at al Trafik hertil har været besørget af andre end færøske Skibe; vi har dog endnu nogle Skibe i færøsk Eje, og vi har før haft færøske Dampskibe i denne Fart, men skønt det var pengestærke Firmaer, der havde disse Skibe, saa har de dog fundet det formaalstjenligt at sælge dem. Jeg maa overfor Hr. Winther fastholde, at der er stor Forskel paa før Krigen og nu. Jeg har ikke just beskyldt Hr. Winther og hans Partifæller for at behandle Sagen agitatorisk, men de ser til en vis Grad lysere paa den, hvorimod vi vil se kritisk paa den. Skulde der senere være en meget vigtig Anledning til at kalde Tinget sammen udenfor Tiden, synes jeg, at Sagen er saa vigtig, at man godt kan ofre det paa den. Hr. Winther hævdede, at man her inde maa lede efter Folk udenfor Forsamlingen for at finde den rette Sagkundskab; det er altid Tilfældet, at saadanne offentlige Forsamlinger som Lagtinget er ofte beskæftigede med saadanne Sager, som ikke alle Medlemmerne kan være inde i, men det maa altid være Forsamlingen, der tager Stilling til Sagerne, og den kan saa raadføre sig med kompetente Mænd udenfor Forsamlingen. J. Patursson sagde ganske nylig, at «Føroya fólk hevði tikið djúpt í lummanø, desværre, jeg synes ikke det har været Tilfældet, jeg synes, det er virkelig altfor lidt.

A. Samuelsen: Eg haldi ikki, at vit kunnu tosa ov líðið um hesa sak, tí hetta er ein ógviliga viktig sak, tí sjálvt teir, ið ganga við, hava óivað eisini í fyrstuni haft teirra beteinkiligheitir, og hava teir ikki tað, má teirra støða sigast at vera nógv ov leys.

J. Patursson: Eg eri so vanir við hasar beteinkiligheitirnar, sum Effersøe og Andras Samalsson hava sett fram; eg kenni tær frá so ofta fyrr, frá hvørja ferð vit skulu hava haft nakað umráðandi og nýtt her á landi, frá tá vit skuldu hava banka, vegir, telefon, hvørja ferð hava hasir mennirnir haft teirra stóru beteinkiligheitir.

O. Effersøe: Det forekommer mig ikke, at jeg har haft Betænkeligheder med at faa Bank, Veje eller Telefon heroppe; det var ikke i 1908 et Spørgsmaal, om vi overhovedet skulde have Veje eller Telefon, men om vi skulde have dem som amtskommunale Foretagender, eller om vi skulde søge Statskassen om Hjælp. Det er en Maade, som Hr. Patursson bruger, at fremstille Sagen anderledes, end den virkelig har foreligget.

A. Samuelsen: Vit vita, at Jóannes Patursson leingi ikki hevur gjørt annað enn

hildið eina talu fyri og aðra eftir um somu sak, og nú, tá tað er talað um at bevilga 700 000 kr., so heldur hann, at hetta er ikki vert at tosa so nógv um.

J. Patursson: Eg vil minna Effersoe á, at hann var aldeilis ikki fyri hvorki banka ella telefon. Um telefonina sogði hann, at tað var luxus. Ein maður úr sambandsflokkinum segði, táið hann sá telefonstøyrarnar liggja niðri í Bakka: har liggja Føroyar. Ein annar segði, táið telefonin suðuri á Borðuni eina ferð var ógreið, at har kundi ein siggja, telefonin kundi ikke nýtast á Borðuni, hvussu kundi hon so nýtast um allar Føroyar?

M. A. Winther: Sýslumaðurin í Suðuroy hevur eina ógviliga lotta uppgávu við at misanbefalla hesa sak og aðrar, ti hann vil óivað vinna nógvar stemmur uppá tað. Tað er tíverri so, at enn er ein stórur partur av Føroyingum so vorðin, at hann ið skapar mistreysti í teimum, hann vil vinna teir. Men latum okkum ikki altíð halda su lítið um okkum sjálvar; minnist hvat ið stendur í Hávamáli: Sjáldan liggjandi úlvur lærbitan fær ella sovandi maður vinnur sigur.

Tað er sagt her fyrr, at táið teir í Íslandi stovnaðu skipafyritøku teirra, tá høvdu teir ikki fingið teknað so mikið, sum her er teknað, og tá læt Íslands Alting 400 000 kr. Nú er Ísland nógv stórri enn Føroyar, men kortini hevði altingið so nógv annað at nýta so miklan pening til. Andrass Sámalsson vil til ta tíð óivað eisini hava sínar beteinkiligheitir við at samtykkja pening til innkeyp av trolarum, tað vil vera sum hansara sinnalag verður tá. Hví segði ikki Andrass Sámalsson hetta ífjør, táið løgtingið vildi lata ½ millión til fyritøkuna, og tað í einari tíð, tá vit vóru heftir á hondum og fótum? Effersoe segði, at vit høvdu kritiserað landsins økonomiska stilling, og tað er sjálvandi: so leingi vit ongar inntøkur hava og alt er læst fyri at fáa inntøkur fyri landið, mugu vit kritisera. Men vit sjálvstýrismenn hava jú ikki ætlað at sita hendur í hupp, vit hava roynt at finna á nýggjar leiðir; vit samtyktu ífjør eina nýggja skattalóg fyri Føroyar, hon er ikki komin úr ríkisdegnum enn. At tað er so illa verðið við offentligari inntøku her á landi, at vit skulu vera noyddir at muga ansa okkum fyri at kalla tingið saman, táið unnáðandi spurningar eru fyri hond, tí eingin peningur er at halda ting fyri, er tað ikki syndarligt? Vit eru eftirbátar her í Føroyum og treingja í stórum til at fáa sett nakað í verk, sum kann menna fólkið. Eg kann á ongan hátt siga, at sambandsmenn hava kent teirra tíð. Vit kanna onga leið við at taka hesa vón frá fólki av púrari beteinkiligheit, tí eg trúgvi uppá hesa sak.

O. Effersoe: Hr. Winther fremsatte den Bemærkning, at vi har stor Gæld, men intet at fylde Hullet med. Er det Indtægterne af Dampskibsselskabet, som skal fylde Hullerne, saa er jeg bange for at stort Underskud. Vi har allerede Ret til at paaligne Skatter til Amtskommunen. Vi har fra vor Side veret forsigtige med Udgifterne, saa der er ingen Vanskeligheder med at rejse Laan og paalægge nye Skatter. Men hvis der ikke arbejdes sparsommeligt fra Flertallets Side, vil Befolkningen maaske ikke finde sig i den fremtidige Skattebyrde.

R. Rasmusson: Sjálvandi má hendla sak áskoðast ikki bert frá teim ljósu síðum, men eisini frá teim svortu. Hartil er einki at siga. Ein hevur til uppgávu at mála svart, ein annar ljóst. Men hví hevur Andrass Sámalsson málað so svart uppá hesa sak? Eg skilji hetta so, at hann nu mátti síggja hesa sak sum ein forretning og at hann raddist at vit skuldu seta pening til. Hansara forútsetning má vera tann, at vit her vilja tjena minni enn tey dpet. vit skula geva í rentu av láninum.

Vit hava eitt fortilfeldi viðvíkjandi offentligari administrasión. A. Samuelsen hevur verið við har. Tað er vøruforsýningin. Vit eru samsintir í at tað var reelt yvirskot, sum vøruforsýningin hevði, tá hin aldra vørumevndin fór frá. Og tó var hesin handil ikki drivin av forretningshugsýni. Um tað var, hevði yvirskotið verið enn stórri. Hendla fyritøkan skal drívast sum forretningsfyritøka, og maður má seta at hon verður administrerað eins vel sum vøruforsýningin. So sigir maður, at konkurrencen nú er stórri. Tað er møguligt. Men so er tað eisini møguligt, at maður við offentligari administrasión kann vinna nakað inn sjálvt um konkurrencan er stórri. A. Samuelsen helt, at tað ikki var lagaligt at keypa skip nú. Í 1914 segði nógvir forrætningsmenn, at nú koma ringar tíðir. Tað bleiv alt annað. Tað er so, at tær tíðir, sum nú eru, eru vanskiligar, og eingin kann tit fulnar skynna á teimum. Men um maður ongan vissa hevur fyri, hvussu tíðirnar verða, so kann maður ikki halda

seg burt frá øllum fyritøkum. Henda fyritøkan skal heldur ikki leiðast offentliga. Fleirtalið hevur skotið upp, at hon skal leiðast av forretningsmonnum og tingið skal hava eitt slags garanti fyri henni. A. Samuelsen kann spyrja, hvar tann maður er, sum kann leiða hesa fyritøku. Tað er ikki altíð gott at vísa mannin uppá forhond. Men tingið fær innvirkan uppá at velja skipafelagsnevndina. So hevur tingið ein garanti har. A. Samuelsen kann siga at tílíkir menn ikki eru at finna her í landinum. Finnast teir ikki her, so finnast teir aðrastaðnis, og vit kunnu væl fáa fatur á teimum. Tað er sjálvandi rætt at síggja sakina frá tí myrku síðuni. Men hon hevur eisini ljósar síður. Eg bleiv heilt inponeraður at síggja listarnar, og júst tí at tann nógvi peningurin er teknaður í smáum. A. Samuelsen vildi pointera, at hann ikki vildi leggja sakini hindringar í vegin. Tað kom hann óhelduga frá. Hann vildi ynskja teimum eydnu á vegin, men aftaná vil eg hava loyvi at tala, segði hann. Tá vil hann gera sær politiskan vinning av tí. — Fyri mær vil tað vera køðiligt um henda sak verður gjøgnum førd við 1 ella 2 stemnum til yvirtal; tí hetta er ein stór og almindilig sak. Minnitalið vil tó ikki kunna resonnera sum so, at hinir hava ansvarið fyri at føra sakina ígjøgnum.

A. Samuelsen: Fyri ordføraranum sýnist tað at dreya seg um stemmur. Hann hugsar um hvat sum kann geva honum tær flestu stemmurnar. Men hann má ikki tilleggja mær tað sama. Hann sigir at Ísland hevur latið meir enn 400 000 kr til skipakeyp. Men tá vit afturímóti skulu lata 350 000, so taka vit munnin nakað fullan. Íslendingar vóru so heldugir, at teir keyptu skip á aðri tíð enn vit. Íslendingar hava væl størri lán enn vit. Men teirra møguligheiter eru eisini størri enn okkara. Teir eru eitt ríki; vit eru eitt amt. Winther segði, at nú er tað farmaskip, sum liggur fyri, og ikki trolarar. Eg vildi fegin hava bæði farmaskip, trolarar og hvalaveiðuskip. Men hvaðan skulu peningarnir takast? Winther segði, at eg vildi vist eisini hava heteinkiligheitir viðvíkjandi trolarum og hvalaveiðu, — tað kom ann uppá eygabliksið hjá mær. Eg seti prís úppá Winther. Hann er eitt eygabliksmenniskja, ein digtarnatúr. Men honum nýtist ikki at trúgva, at eg eri av sama slag. Winther segði, at eg kundi hava sagt tað sama ífjør. Meg minnist at tá sakin kom aftur frá novudini, tá var eg ikki í tinginum. Eg skuldi fara niður. Winther má ikki ivast í, at um eg ikki var tilstaðar, so havi eg framborið mína meining kortini. Winther talar um at ekkara økonomiski status nú er heilt bedrøviligur. Hví tá belasta hann meiri? — Føroya løgting er ikki meira enn amtsráð. Men tá nan nú kallar tingið saman hvort ár, so verður tingsins støða annarleiðis enn hon hevur verið. Eg haldi at tingið vil minka eitt sindur við, at vit kalla tað saman við hvørja leilighoit, sjálvt um vit kundu hava ráð til tess. Eg haldi at vit verða noyddir at kalla tingið saman einaferð enn í hesi sak. Winther sigir, at sambandsmenn ikki hava kent teirra tíð. So mikið betur fyri Winther. Men um sjálvstýrið verður við at vera fleirtal, so verða teir nakk formiftigari enn sum tá teir vóru í oppositión. Til R. Rasmussen kann eg siga, at tað, sum eg málaði upp av svørtum, noyðist tingið at mála upp seinni, tá lánið verður upptikið. Eg peikaði á tvey ting: Um vit kundu binda keypmenninar, so vil tað broyta mína støðu. Og líkaleiðis um vit halda framm við at dríva monopol í Tinganesi. Tað vil eisini broyta mína støðu til skipakeypið. Tann mynd R. Rasmussen gav av reiðarí og veruforsýningini hoyrir ikki heima her. Man kann ikki shutta frá tí til hetta. R. Rasmussen talar um direktørin. Eg haldi ikki vit noyðast at fara út um Føroyar til at finna ein tílíkan mann. So sigir R. R., at Føroyafólk hevur teknað nógvan pening. Tað er satt. Eg hevði ikki væntað tað. Atvoldin er væl tann at tekningin gekk fyri seg á einum tíðarbili, tá men var undir fólisi av kríggin-um. Man fyri helt fólki, at tað kanske vildi vera vanskiligt at fáa tonnage. Síðani havi eg latið mær fortalt, at mann reklameraði við at tingið vil styðja hesa sak. R. R. endaði við at siga at tað var illavorðið av mær at siga, at eg vil útnytta skaðan. Eg sagði, at eg vildi vera glaður um tað gekk gott, men vildi hava loyvi til seinni at koma aftur til hetta. Eg tráddi, at eg her stóð yvirfyri einari sak, ið ikki var politisk, men nú skilji eg av Mads Winther, at hon skal nýtast politisk. Gongur hon væl, skulu sjálvstýrismenn eiga sømd av tí, gongur tað illa, skulu sambandsmenn hava skyldina.

R. Rasmussen: Andrass Sámalsson helt, at tað var køðiligt at kalla løgtingið saman fyri eina sovorðna sak, eg vil vóna, at Andrass Sámalsson dregur konsekvensurnar av hasum her, tí so má hann blíva

sjálvstýrismaður. Vit ynskja ein mann millum tingseturnar, ið stendur tinginum til svars, so nýttist ikki løgtingið at koma saman í úrtíð til eina slíka avgerð. Amtmaðurin stendur ikki tinginum til svars, so tað er einki annað hjá okkum at gera í einari slíkari sak enn at kalla tingið saman. Tað er nú so nógv tosað um at landshandilin í Tinganesi skjótt má halda uppat, tí hann hevur monopol uppá handilin í Føroyum. Tað er so vorðið, at tað offentliga í sumum londum nú netupp tekur monopol uppá sumar vørur og tekur allan vinningin, tað kann kanska vera, at vit eisini her í Føroyum vilja ganga ta leið.

O. Effersøe: Det var interessante Udtalelser fra R. Rasmussen om Monopolhandel. Vi har nu fra alle Sider hørt saa meget om Frihandel, fri Konkurrence o. s. v. Men nu hører vi pludselig R. Rasmussen lovprise Monopolhandel som noget attraaværdigt.

R. Rasmussen: Effersøe kann ikki rættiliga fylgja við, hvat ið hendir í verðini, tykist tað. Tað skuldi annars verið almannakunnugt, at tað alt meira gongur ta leið burtur í teim stóru londum, at staturin tekur inntøkuna av einstøkum vørum ella fyritøkum, ið koma øllum til gagns.

A. Samuelsen: Í virkiligheitini eri eg betri sjálvstýrismaður enn R. Rasmussen. Tí vit stýra okkum sjálvum her í Føroyum, vit stýra okkara amtskommunalu sökum og amtmaðurin er í tingsins stað, táið tingið ikki er saman. At vit skulu kalla tingið saman líka ofta sum vit fara eftir doktara ella einari konu, ið summar tíðir er til brúks, haldi eg ikki. R. Rasmussen vildi hava tað til tað, at eg hevði botcinkiligheitir fyri at vit fingu menn til at leiða fyritøkuna; eg hevði heilt aðrar betoinkiligheitir. Eg havi ikki úttalað meg um, um eg vil ganga við, táið vit bert tapa hálvan kapitalin; eg havi sagt, at mær dámdi hvørki fleirtalsins ella minnitalsins uppskot, men forbehaldi mær mín stilling.

M. A. Winther: A. Samuelsen helt tað vera munur á, at Ísland gav 400 000 kr. til eina fyritøku og vit 350 000 kr., og veit ikki, vit eru meira mentir nú, enn Íslendingar áðrenn kríggið, og skip eru dýrari nú enn tá. Íslendingar sigast nú at hava eini 4—5 skip í skipafelag teirra, so teir eru ikki bangnir fyri at halda fram í skipafelag teirra. Hví skulu vit vera so bangnir fyri at honda fyritøkan ikki skal eydnast og felagið missa allan hitapeningin? Vit hava sæð dømi uppá at partafelog her á landi ikki hava eydnast; t. d. eru fyritøkur við sluppum summatíðir heilt dotnar niður fyri, men vit hava væl enn fleiri dømi uppá, at slíkt hevur eydnast. So við og við fáa vit lærdóm; tað ræður um at fáa menn til at skipa fyri fyritøkuni, ið hava skil uppá leiðilsið. Okkara økonomiski status er ikki góður, tað havi eg sagt áður; men at viðganga tað, er tað fyrsta stigið til at bøta um tað, og eg vóni, at A. Samalsson vil styðja tað uppskotið, vit bóru fram ífjør um eina nýggja skattalóg. Eg vil ikki siga meir, men mæla tingmonnunum til at lata sakina koma til 3. viðgerð.

A. Samuelsen: Tað er ikki talað um, at vit betri enn Ísland kunnu styðja hesa fyritøku við stórum studningi. Eg kundi forstaðið um vit teknaðu okkum fyri 50 000 kr. til hetta skipið, tí tað kundu vit kona yvir, og tað er ein stórur studningur. Mads Winther tosaði um, at Føroyingar eru ferir fyri mongum og kunnu taka lærdóm, ja tað kunnu teir, men eg trúgvi ikki at hann er so djarvur, at hann kann siga, at tað at lata 350 000 kr. til eitt sovorðið skip er at bøta um hin økonomiska standin hjá amtskommununi.

M. A. Winther: Eg havi víst á vogin til at bøta um okkara økonomiska stand, og eg trúgvi, at hetta verður ein rentabel fyritøka, meðan A. Samuelsen heldur hitt mótsetta.

A. Samuelsen: Eg skilji M. A. Winther soleiðis, at tað ið vit geva her, skulu vit taka inn aftur í skøttum. Eg haldi tað ikki vera vakurt av M. A. Winther at geva fólki í Føroyum hetta tilskot og síðani pína tað við at taka tað inn aftur í skøttum.

M. A. Winther: Eg hevði ikki trúð at A. Samuelson kundi torga sær so langt út, sum hann her gjørdi. At kunna fáa seg til at siga, at eg vil hava, at Føroya fólk skal pínast við skøttum fyri tað, at tað fær hesa fyritøku í lag, táið eg tali um skattir sum svar uppá Effersøes orð um tann økonomiska standin her á landi, tað er meira enn vágað. Serliga táið eg leggi aftrat, at eg trúgvi, at hetta verður ein fyritøku, ið fer at bera seg.

A. Samuelsen: Eg skilji ikki M. A.

Winther. Hann sigur við Effersøe: vit hava gjørt eina skattalóg fyri at bøta um hin økonomiska standin, so má eg trúgva, at tað skal vera gjøgnum skattir, at status verður betri. Og eg fái onga aðra meining úr M. A. Winthers orðum enn, at Føroyingar hava loyvi til at tekna helvtina av aktiukapitalinum, hina helvtina skulu teir gjalda sum skattir eftir teirri skattalóg, sum løgtingið samtykti ífjør.

Samtykt varð at sakin skuldi til 3. viðgerðar.

Bønarbræv frá sildaveiðu felaginum.

2. viðgerð.

Edw. Mortensen: Tað er komið bræv til tingið frá sildaveiðufelaginum um studning. Nevndin, ið var sett til at kanna eftir hesum, hevur hatt eina samtalu við formann felagsins um tess viðurskiftir. Eftir teim upplýsingum, ið nevndin har fekk, er felagið ikki anmeldað til fimaregistorið, tað hevur ikki kunnað tryggjað skip sítt, so løgtingið hevur ikki kunnað fingið sikkerheit fyri sín pening. Nevndin hevur givið soljóðandi álit: »Tinget ser sig ikki i Stand til at yde »sildaveiðufelaginum« Tilskud.« Eg skal biðja tingmenninar geva hesum uppskoti teirra atkvøðu.

Uppskotið varð samtykt.

Fundur tórsdag 30. januar.

Bønarbræv frá O. á Heygum.

2. viðgerð.

J. Patursson: Hetta mál um studning til tvær støður í Vágum og Vestmanna hevur nú verið í nevnd. Umsóknin er frá statsgældsdirektør Andersen og verkfrøðingi Vedén framsend frá O. á Heygum. Av tilfarinum, sum nevndin hevur fingið upp í hendur, sæst at tað fánst 6000 hestakreftur úr Sørvágsvatni og 3000 úr Fosá, tá alt er útbygt. Kostnaðin fyri verkini í Vágum og Vestmanna er tilsaman 1 560 000 kr. Tá leidningar og tílíkt koma aftrat roknast tað til 2 mill. Hetta felagið hevur fingið rætt til grundir fra ánarnum á plássunum. Sakin er væl úr hondum greidd frá verkfrøðingum, og henni fylgja allir upplýsingar. Alt er soleiðis í lagi. Justitsministeriið hevur eisini játtað sítt samtykki undir treytum, sum tað sjálvt setur á. Tað er áður ikki gjørt annað úr okkara ánum og vatnum enn at vit hava haft nakrar mylhur. Elektriskar máttarstøðir sum í grannalondum okkara, hava vit ongar haft. Tá land okkara er so lítið, er tað á hendan hátt ikki dánað so væl sum nøkur onnur lond. Men regnið er nógv og fjøllini høg. Hvat vit kunnu fáa úr streymunum vita vit enn lítið um. — Tað sum her liggur fyri er eitt fullfiggjað verk, væl greitt úr hondum. So at tað bara stendur á at fáa tað á gongd. Øll fyrireikandi arbeiðir eru gjørd. Hetta skyldast mest einum manni, sum hevur arbeitt ógviliga tolin og hevur fingið aðrar at styðja seg og ganga í felagsskapi við sær. Kann hetta koma í lag, so tær tað ónetaligan týdning fyri tey pláss, sum røkka til streymin, sum verður leiddur har frá. Og ikki minni týdning fær hetta við at verða sláðhrótandi fyri aðrar tílíkar fyritøkur. Tað má tí vera ein uppgáva fyri tingið at styðja hetta. Men tingið er ikki fært fyri beinan vegin at geva studning og nú tí skjóta uppá, at tað verður gjørt úr ríkiskassanum. Umsóknarmenninir hava ikki biðið um beinleiðis studning; men teir biðja tingið at biðja ríkiskassan geva studning í einum bóskandi formi. Vil tað danska yvirvaldið gera nakað, ráða teir fyri hvat treytir teir leggja á. Eg skal mæla til at tað uppskot, sum vit í nevndarfleirtalinum hava gjørt hesi sak viðvíkjandi, verður samtykt. Um minnitalsuppskotið skal eg einki siga fyrr enn minnitalsorðførariu hevur talað.

O. Effersøe: Paa Mindretallets Vegne skal jeg fremføre nogle Bemærkninger. Hele dette Spørgsmaal om Udnyttelse af Vandkraften i vore Elve har foreligget for Tinget tidligere. I 1907 forelaa der fra O. á Heygum en Ansøgning om et Laan til Elektricitetsværk i Vestmanhavn. Der blev den Gang imidlertid ikke foretaget noget fra Tingets Side. Saa fik vi i 1910 en lignende Sag. Det var et Selskab »Føroya Handil og Industrie, som fremtraadte som Ansøger. Da man undersøgte Formaalet, viste det sig, at det var Købmandshandel, man agtede at drive. Selskabet vilde benytte O. á Heygums Ejendom i Vestmanhavn. Endvidere angaves, at man vilde udnytte Kraften i Elven i Vestmanhavn og benytte den til industriel Virksomhed samt til Lys og Varme.

Til denne Sag indtog Lagtinget den Gang den Stilling, at man kunde ikke anbefale den, særlig da der dengang var tilsigtet en saa stor Grad af Handel, at det maatte betragtes som en Slags Monopolhandel, i hvert Fald for en begrænsat Del af Færøerne. Det syntes Tinget ikke om, hvorimod det udtalte sig anerkendende om Udnyttelsen af Vandkraften i Fossa; man tog dog et Forbehold, i det man ikke ønskede, at Olaf á Heygum skulde have en ledende Stilling indenfor Selskabet. Dette blev vedtaget med 18 Stemmer mod 1. Der er hidtil ikke kommet noget ud af denne Sag, som nu foreligger igen. Det ses, at det er det samme Selskab, som nu vil drive Elektricitetsværk paa Vaagø, og der foreligger intet om, at Virksomheden skal drives paa en anden Maade, den er blot bleven saa meget mere omfattende. Mindretallet finder det rimeligt og naturligt, at Tinget stiller sig paa et lignende Standpunkt som i 1910. Jeg maa tilføje, at Mindretallet mener, at herved vil selve Sagen aldeles ikke hindres, men der vil tværtimod skabes de bedste Betingelser for at rejse Sagen paa rette Maade. Hvorvidt det paatænkte Foretagende er tilstrækkelig vel begrundet og oplyst, kan Mindretallet ikke danne sig en Mening om. Der foreligger Ingeniørberegninger og Dokumenter, hvorved der overdrages til Andrageren, Olaf á Heygum, visse Rettigheder, men hvorvidt disse Dokumentor er absolut fyldestgørende, har Mindretallet ikke kunnet skaffe oplyst. Det har selvfølgelig en vis Betydning, at disse Dokumentor foreligger, men det vilde være heldigt, om der forelaa fyldigere Oplysninger. Da Sagen imidlertid synes at være saa vigtig, at man absolut bør tage Stilling til den i indeværende Lagtingssamling, har man ment at burde se bort fra, at der ikke foreligger Oplysninger fra alle de Kommuner, der er interesserede i Sagen. Mindretallet lægger ikke Selskabet nogen Hindring i Vejen, men bidrager tværtimod til Udnyttelsen af Vandkraften paa Vaagø og i Vestmannahavn paa den mest hensigtsmæssige Maade.

J. Patursson: Tað var heilt forvitnisligt at hoyra Effersøe tala, serliga tí hann altíð sjálvur heldur seg vera so sera sakligan, men her, hvar ræður um eina nýbyrjaða, týdningar mikla sak fyri Føroyar, her talaði hann einki utan persónliga um ein mann. Eg skal siga eitt sindur um hetta, Effersøe nevndi um hvat ið bar á fyri 8 árum síðani. Effersøe minti á, at tá vórn 18 atkvøður fyri løgtingsins samtykt. Ja, tá hildu tingmenn flest allir við Effersøe og tá helt Effersøe serliga fram, at um teir ikki góvu atkvøðu uppá eitt sundt Grundlag, et passende eller hensigtsmæssigt Grundlage ella hvussu hann nú segði, so skuldi sakin drepast. Og heldur enn tað vildu nógvir tingmenn geva teirra atkvøðu, sum teir góvu, so var løgtingið ikki beint avvísandi. Tað hevur ikki verið hildið fyri vakran atburð í Føroyum, táið maður hevur hatt eitt roes til at sleipa allan dagin, og hann so á kvøldi gevur tí boygslið um ein vissan part, ið eg ikki skal nevna her. Tað er nakað tað sama, sum minnitalið her ger. Her er ein maður, ið hevur strevast og arbeitt fyri einari almannagagnligari sak, og nú, táið hans verk skal til at byrja at geva úrslit, vil Effersøe skúgva hann burtur, so aðrir kunnu fáa fruktirnar. Fleirtalið hevur ikki hildið seg til at taka dagar ímillum nakrar persónar, men biður statin fremja verkið á tann hátt sum nú tykjast beinast.

Edv. Mortensen: Tað vórn sagdar av ordføraranum fyri minnitalinum tvær hovuðsatfinningar, fyrst ímóti handli og síðani móti einum persóni. Hvat ið tí fyrstu viðvíkur, so er handil einki óhederligt; her er ikki tala um monopolhandil, men absolut um fría konkurrence. Eg kann ikki siggja, at tað er nakað skeivt í tí, at hetta felagið hevur handil umframt. Tað offentligo hevur kontrol við driftini av máttstøðuni og kann seta prísirnar eftir sum teir eiga at vera; at partafelagið handlar umframt, kann einki skada. Um minnitalið meinar, at p/f. Føroya Handil og Industri ikki skal kunna driva handil og máttstøðu saman, so fáa vit onga máttstøðu í Vestmanna í nærmasti framtíð, tí sjálvandi vil partafelagið ikki geva sínar planir og ræðtindir til eitt annað partafelag, og nógvar av ræðtindunum eigur Ólavur á Heygum persónliga, so eitt nýtt partafelag má byrja heilt av nýggjum. Nú er minnitalsuppskotið kanska at skilja á tann hátt, at hetta felag kanska vildi verið betri stýrt, um Ólavur á Heygum ikki fekk nakað loiðandi pláss í tí. Tað haldi eg ikki hoyrir løgtingimum til at trongja seg fram á hendu hátt. Tað skuldi so verið at Ólavur á Heygum ikki kundi stílað fyri felagnum, tí ein straffidómur er yvirgingum honum, men hetta er ein so ógviliga gamaldags hugsan. Hesin maður er nógmikið straffaður, og eg haldi ikki at løgtingið skal siga ein nýggjan straffidóm yvir mannin, tað

høyrir ikki undir løgtinginum, men undir handilsministerinum, at siga um hann kann skipa fyri partafelagnum ella ikki, og tað er tí heilt skeivt um vit úttala nakað persónligt um henda mann. Eg vil mæla til, at eingin stemmar fyri minnitalsuppskotinum.

O. Effersøe: Hr. J. Patursson sagde at afkræfte mine Udtalelser om den Stilling, Lagtinget indtog i 1910, ved at sige, at Tingmændene var blevet truet til deres Stilling. Det er ganske forkert. Jeg fremførte i Tinget, hvad jeg og mange andre krævede for at fremme Sagen. Jeg ved ikke, hvordan man skulde fremstille Sagen paa anden Maade. Om saa nogle Personer har haft den Opfattelse af min Stilling, som Hr. Patursson, saa vedkommer det ikke mig. Hr. Johannes Patursson sagde, at vor Stilling havde været personlig. Det maa jeg bestemt nægte. Noget andet er, at der er en Person indenfor Selskabet, som vi mener er uheldig, ligesom vi mener, at Sagen er fremført uheldigt. Det er Hr. Olaf á Heygum selv, der har stillet sig frem, og jeg mener, at han havde gjort vel i at træde i Baggrunden. Hr. Edw. Mortensen mente, at det var en gammeldags Betragtning, at vi ikke ønskede Hr. Olaf á Heygum indenfor Selskabet, og at vi vilde afsige en Straffedom. Det er absolut urigtigt. Men naar der fremsættes en saadan Begæring om Anbefaling til Tinget, saa er det for at vi kan give Sagen vor absolutte Tilslutning, og det mener jeg ikke, vi kan, saadan som den nu foreligger. Jeg kan ikke gaa med til at anbefale Hr. O. af Heygum som Leder af denne betydningsfulde Sag, som jeg ønsker absolut løst paa et godt Grundlag. Det drejer sig ikke om, hvordan man stiller sig til Udnyttelsen af Vandkraft i Vestmanhavn, men om at man vil bruge Lagtinget til at tage Stilling til Hr. Olaf á Heygum personlig. Jeg ønsker ikke at tage Stilling for eller imod. Om Ó. á Heygum faar Oprejsning er en Sag for sig. Jeg skal ikke være uglad, om han faar Paaskønnelse. Mortensen udtalte, at det ikke kunde faa nogen Indflydelse om Sagen var forbunden med Handel. Jo, det kan, Selskabet stiller i Udsigt, at der vil blive oprettet Filialer og at man vil udelukke al Konkurrence. Man siger ligefrem, at de stedlige Forretninger er dømte. Da kan det offentlige ikke godt yde et saadant Foretagende sin Støtte. Saa siger man, at naar ikke Handelen tages med, kan der ikke blive noget af det. Selskabet kan udsortere Handelen og lade den være noget for sig. Naar der er talt saa meget om O. á. Heygum, at han har udøvet en betydningsfuld Virksomhed og man ser paa ham som en Foregangsmand, saa mener jeg, at han bør tage en Stilling til denne Sag, som kan gavne den, og udsondre det af Sagen, som ikke er til dens Gavn, saa at han indtager en mere tilbagetrukken Stilling her. De Herrer mener, at han skal indtage netop en Førstestilling. Jeg mener, at den Omstændighed, at der ikke har kunnet rejses tilstrækkelig Kapital til Sagen, er fordi han er knyttet til den. Ellers skulde det ikke være vanskeligt at rejse den fornødne Kapital. Det er min Opfattelse af Sagen.

R. Nielsen: Eg havi verið við í nevndini, men tá ordførarin fyri nevndarflertalinum hevur greitt frá okkara støðu, skal eg ikki gera nógv av. Mær tykist, at minnitalsordførarin ikki hevur gott skil á hvat sum stendur í prospektinum. Hann sigir, at henda fyritøkan skal hindra ollum handli í Vestmanna. — Tá man inn bjóðar til aktiutøkning ger man fyritøkuna so ljósa sum tað er forsvarligt. Tað stendur í prospektinum, at fyritøkan eisini skal umfata m. a. smiðkarverkstað, skipsbeitling, og ullavørufabrikk, og at hetta ikki skal kunna konkurrerast í hel. Slíkt hevur man væl loyvi til at siga. Eg haldi, at Effersøe byggir sína mótstøðu móti hesi fyritøku á persónligan óvilja móti O. á Heygum. Hann sigir, at hann ikki vil styðja hesa sak utan við teim treytum at O. á Heygum ikki skal fáa nakran leiðandi stilling. Tað er soleiðis persónurin O. á Heygum sum Effersøe vil seta utanfyri. Men hann kann mann væl ikki koma utan um. Hevur O. á Heygum gjørt eina ringa gerð, so hevur hann eisini liðið eina stóra straff fyri tað, og og vil ikki vera við nú at dømna hann aðri ferð. Hevur hann einaferð gjørt eina ringa gerð og fingið straff fyri tað — nú skal hann aftur dømast fyri tað at hann førir eitt samfundsgagnligt mál fram. Tað vil eg ikki vera við til; eg yvirtáki tað til Effersøe. — Effersøe ynskir at fáa erkleringar viðvíkjandi hesi fyritøku frá ymsum kommunum, úr Vestmanna, Hvalvík, Sørvági, Bø o. s. fr. Hann kundi líka gott hava tikið til Froðba, Klaksvíkar ella Sunnbøarkommunu; hann veit at tær eru líka lítið interesseraðar. Effersøe kemur soleiðis at stranda í hesum eisini. Effersøe vil ikki vera við at fáa okkum elektricitetsverk. Mær kemur í hug Rockefeller, sum gav hvørjum húsi eina lampa til gávu og harvið fekk tann heila

bý til kundar. Hevði hotta selskapið gingið fram á slíkan hátt og givið t. d. Effersoe fríar lampur, so vildi hann ivaleyst olivið selskapinum ein tann besti kundi. Veðurlagið her i Føroyum er vanskiligt og váttligt. Men nú vil man júst úr okkara vætu og regni kunna skaffa turra, t. v. s. man vil kunna fáa varma til at turka við. Ein stórur partur av fiski má fara ráur úr okkara landi. Men elektriskur varmi er bestur at turka fisk við. Eg skilji ikki at Effersøe sum klókur maður kann leggja aðrar út fyri at vilja forða hesum máli. Eg biði hann at lata sína fornuft ráða og ikki stara seg illan uppá O. á Heygum, men heldur taka sítt uppskot aftur og mæla tinginum til at styðja fleirtalsuppskotinum.

O. Effesoe: R. Nielsen siger, at det er O. á. Heygum, man ikke kann nudgaa. Indtil videre har jeg den Tillid til O. á Heygum, at han lader Sagen gaa frem for sin Person. Han behøver blot at trække sig passende tilbage. R. Nielsen sagde, at nu havde O. á Heygum faaet et samfundsgavnligt Værk istand. Det er et Spørgsmaal. Han har fremsat Planer; ikke andet. Jeg vil bede R. Nielsen anmode O. á Heygum om at faa Sagen i den rigtige Gænge. Jeg skulde ogsaa være strandet paa Spørgsmaalet om Kommunernes Erklæring. Han kunde ikke forstaa, at man i Bø f. Eks. skulde have nogen Interesse af Foretagendet. Jeg har faaet den Opfattelse, at man i Bø ikke har nogen retslig Interesse af den. Men Bø's Sogns Beboere findes paa Vaagø, om end Bygden Bø ikke ejer Sørvágsvand. Og disse kunde have Interesse i, at Kraften i Sørvágsvand ikke kommer til at hvile, men kunde maaske ønske, at Staten byggede Kraftstationen og driver den. Bø kan altsaa have Grund til at udtale sin Mening. R. Nielsen glemte at tale om Thorshavns Byraad. Det har Interesse i Sagen, idet der har været Spørgsmaal, om man skal tage Kraft fra Fossaa eller man skal tage den andensteds fra. Det ligger nær at forelægge Sagen for Byraadet. — Det er ellers Meningen, at Tinget skal slutte snarest, og der er derfor nu ikke Tid til at forelægge den dér. R. Nielsen siger, at Selskabet burde forære mig en Lampe. Tænker han derved at bestikke mig. Og han vil lære mig at udnytte den elektriske Kraft. Det kan han ikke lære mig. Det kan jeg paa Forhaand. R. Nielsen har maaske ikke en saa rigtig Opfattelse af Elektricitoten, som han selv mener. Jeg har ikke vidst, at elektrisk Varme var anderledes end Varme af anden Art, og at den skulde være bedre til Tørring af Fisk. R. Nielsen henstiller til mig at se bort fra Personen O. á Heygum. Det er netop det, jeg vil. Saa gaar Sagen nok i Orden.

J. Patursson: Eg vil biðja Effersøe bera vitnisburð fyritað, sum hann segði nú: At skjóta O. á Heygum út. Eg vil biðja hann bera vitnisburð fyri, at sakin tá ikki fer nakrar vansar. So sigir hann, at Ólavur ikki skuldi hava borið sakina framm. Tað skuldi onkur annar. Hvor? Tað eru 3 í novndini. Skuldi annar hesin danski maðurin borið sakina framm? Skuldi Vedén biðið tingið um viðmæli til statin um hetta mál? Ella skuldi Andersen? Heldur ikki. Hvor skuldi so ntan O. á Heygum? Hvønn annan kundi Effersøe sett á. Hann sigir, at tingið ikki skuldi seta sítt stempul á sakina. So er. Men Effersøe vil hava tingið at seta stempul á sakina. Tað vilja vit ikki. Og hann vil, at tingið skal seta eitt svart stempul á sakina. Fólk ynskir at fáa sakina á gongd. Um tingið sigir, at O. á Heygum fyrst má burtur úr, so er tingið ikki ting fyri Føroyingar.

Vit kunnu skilja, at hrr. Oliver Effersøe í sínum innarsta onga vælvild eigur yvir fyri Ólavi á Heygum. Tað vita vit eisini frá fyrr, teir hava haft so mangan brostin saman. Men tað er lítið hóskandi fyri ein mann sum hrr. Effersøe at gera eina so góða sak sum hesa til eina reint persónliga sak. Vit hava her á tingi einki við persónin Ólav á Heygum at gera, tað er nakað vit eiga at yvirláta til justitsministaran. Nakað annað var, um hrr. Effersøe vildi leita eftir hvussu vit skulu nýta hesa rúgvu av h. k. í Vestmanna til nýtslu fyri allari Streymoynni til verksmiðjur, so var tað talað sum ein góður tingmaður eigur.

R. Nielsen: Eg trúgvi ikki, at hitt offentliga í Føroyum vil leggja dent uppá at byggja eina so stóra fyritøku sum hetta elektricitetsverk. Fyri Vágar er tað soleiðis, at kommunan hevur fingið sær rættin til vatnið, og hevur givið henda rætt til Føroya handil- og Industrifelag. Tað er ætlanin har vesturi at nýta 600 h. k. til ljós og hita og tað ið av loypur, skal so nýtast til industri. Bygdin Sandavág hevur gjørt rannsóknir fyri seg sjálvan, men tað verður so nógv dýrari hjá teimum enn um teir tóku kraft úr Seyrvágsvatni. Hr. Effersøe talaði um Tórshavn. Hann legði dent uppá eitt úttalilsi frá Havnarbýráð,

Ja, tað hevur altíð verið talað um at fáa mátt úr Fossá, bæði í Vágar og til Tórshavnar, men eg haldi ikki at tað hevur sýnt seg stór interessa í Tórshavn fyri elektricitet úr Fossá, tó tað haldi eg ikki at felagið skal leggja í; sjálvt um tað missir Havnina vilja teir aftur í staðin kunna fáa Eysturoynna. Eg haldi, at sakin liggur fyri so gott sum hon kann, so eg skilji ikki hrr. Effersøe, tá hann sigur, at hon er einki upplýst. Teknisk sæð er so nógv klárlagt fyri okkum, at vit vel kunnu skilja, at hetta kann setast í verk. So vítt eg kann síggja hevur Ólavur á Heygum brúksrættin til alla Fossá, so eg veit ikki, hvussu tað er mugiligt at koma utan um hann. Effersøe segði, at tað ger tað sama at turka fisk við elektriskan hita og við hita frá koks ella lorvi, tað hevur hrr. Effersøe vist ikki gjört seg heilt kunnugan við enn, men vit mugu taka útyvir tað, tí ein sýslumaður hevur jú ikki dagligt brúk fyri at turka fisk.

O. Effersøe: Det, der er Spørgsmaal om, er, om Staten skal yde denne Sag Støtte, ikke om en enkelt Person. Naar vi sender denne Sag til Regeringen, saa maa Sagen være saa oplyst, at de Personer, man sender den til, tager velvilligt imod den. Jeg vover den Paastand, at man paa det foreliggende Grundlag ikke kan vente en Gennemførelse af Sagen i Rigsdagen. Tiden vil vise, hvem der var Sagens bedste Ven, jeg eller d'Herrer. Det er blot mit Skøn, men jeg tror sikkert, at Sagen ikke kan gennemføres i Rigsdagen. Jeg vil blot pege paa, at hvis en Mand som Statsgældsdirektør Andersen tager to Mænd sammen med sig og ikke Ólav á Heygum, saa tror jeg, at Sagen lettere vil opnaa Statsstøtte. Vi kan ikke komme Sagen nærmere end ved at undersøge det Spørgsmaal, om vi har fremstillet Sagen paa den for dem gunstigste Maade eller Flertallet. Jeg maa finde mig i, at man siger, at jeg har en personlig Uvilje mod Ólav á Heygum, det er dog ikke Tilfældet. Jeg har undertiden maattet tage Afstand fra Foretagender, som skulde ledes af ham, fordi jeg saa, at de ikke blev fremmet paa den mest hensigtsmæssige Maade. Jeg har før 1910 anbefalet til Regeringen at yde ham Koncession paa saadanne Vilkaar, som var tjenlige for ham. Jeg har aldeles ikke noget personligt imod Ólav á Heygum. Det er bedrøveligt, om det er gaaet mig saa ilde i Diskussionen med Hr. Rasmus Nielsen, som han mener, i saa Fald er det noget ganske nyt. Jeg mener ikke, at det er gaaet mig ilde. Jeg har ikke udtalt mig om, hvorvidt det er bedre at tørre Fisk med elektrisk Varme eller Varme af Koks; jeg har blot udtalt mig om selve Varmen, om den Varme, der frembringes ved Elektricitet, skulde være af mere behagelig Beskaffenhed end f. Eks. Koksvarme. Jeg har mine Tanker om, hvem der ved bedre Besked om disse Forhold, men det er vist ikke værd at fordybe sig heri.

J. Paursson: Hrr. Effersøe segði, at honum nýttist ikki at fara vitnisburð fyri áskoðan sína á Ólav á Heygum; og skal prógva at hann ikki kann og tað haldi eg vera óheldigt í almennari samkomu. Eg skal lesa eitt bræv til mín frá einum manni um hetta:

». . . Sagen er nemlig den, at Banken, som vi har henvendt os til, endelig har meddelt os, at den, da Anlægsudgifterne efter dens Mening næppe vil komme til at staa i Forhold til de forventede Indtægter, ikke paa den foreliggende Basis bør paatage sig Financiering af Foretagendet . . .«

Tað er nevniliga víðkað so nógv um fyritøkuna nú, at hon ikki fer at bera seg í teim fyrstu árunum, við tað at alt hetta verður so dýrt at seta í verk, og tað er í fyrsluni at staturin skal stýðja sakina. Seinni í brævinum sigir hesin sami maður:

». . . En stor—og maaske afgørende—Hindring for Sagens hurtigste Fremme har det været, at der fra de respektive Steder og da særlig Thorshavn — hvor Kraften tænkes konsumeret, ikke har kunnet opgives nogen omtrentlig Omsætning. Havde dette foreligget og i tilfredsstillende Omfang, vilde formentlig Sagen have været i Orden og Kapitalen være sikret til Anlæggenes Paabegyndelse.«

Eg skal einki ilt siga um Havnarbýráð, men teir hava verið ónatúrliga seinførir. Teir kundu haft sagt annaðhvørt ja ella nei, sum nú er hevar tað bundið felagið á hondum og fótum; eingin skal ivast í, at er tað fyrst komið í lag, skal tað vel bera seg. Effersøe segði, at ríkisdagurin vil ikki játta hesum á »det foreliggende Grundlag«. Er hetta ein nýggj hóttan? ein veit jú ikki; vit hava jú sæð so mong dømi í teirri seinastu tíðum uppá undirhanda arbeiði úr Føroyum, sum eingin skuldi trúð áðrenn sambandstíðina.

Tórgarð: Tað er vanskiligt hjá okkum

sum ikki eru í nevndini at taka støðu til uppskotini, ið fyriliggja. Í nevndarálitinum sipast til upplýsingar, sum fyriliggja í sakini. Men teir kunnu ikki vísast fyri ollum tinguonnunum. Mær dánar ikki væl uppskotið frá fleirtalinum. Tað er lítið natúrligt at tingið mælir til stats studning til tílíka merkantila fyritoku. Hetta er ein handilsfyritoka. Tað varð eg enn meiri styrktur í eftir ræðuni hjá R. Nielsen, og eftir tí sum upplýst er, tá sakin fyrr var fyri á tingi. Nú kundi man trúgva at sakin fyrilá annarleiðis. Men so er ikki. Tað er ringt at taka støðu, tá vit ikki kenna teir upplýsingar, sum liggja frammi í sakini. Uppskotið frá minnilutanum fellur mær heldur ikki. Og eg stemmi fyri hvørgum uppskotinum. Eftir ræðunum, sum báðir orðførarnir hava hildið, fær man ein grunnan av teim upplýsingum, sum fyriliggja. Havnin er ofta havd á máli. Viðvíkjandi Havnar býráð vil eg siga, at um tað fyriliggur at Havnin er kundi til 100 hestakreftur, so er tað ikki. Síðani vil eg siga til Paturssom, at tað ikki skyldast Havnar býráð at tann spurningur ikki er ordnaður enn. Tað hevur einki ligið fyri Havnar kommunu. Selskapið hevur ikki lagt nakað positivt fram fyri býráðið. Tað fyriliggur einans eitt skrivilsi frá einum manni, sum ikki er formaður í hesum falaginum. Tað skyldast tí ikki Havnar býráð at tað ikki hevur tikið støðu til henda spurningin enn. Hetta mál er í slekt við eitt annað mál, sum er fyri á dagsordanum. Tað handlar um almenna grauskíng fyri allar Føroyar og um kommunal elektricitetsverk. Tað vóru tey kommunalu verkini, sum skuldu styðjast. Eg dugi ikki at siggja at júst hendan fyritoka skal vera tann sum skal vísa vegin fyri øðrum elektrisitetsverkum í Føroyum. Aðrar kommunur eru komnar nokk so langt á leið. Og hví skal hetta felagið fáa fyrimun fyri kommununum. Í Havnar býráð komu ymisk ting fyri, sum gjørdu at man var nakað betonkiligur við at anbeðalla hetta felagið til statsstudning. Tað er sagt, at hetta felagið hevur roynt at fáa fatur í ollum teim kraftkeldum, sum eru um alt Føroya land. Tað er ikki tiltalandi fyri hann, sum hevur við kommunalt arbeiði at gera. Eg segði, at tað eru kommunur, sum eru komnar væl á leið. Og Havnar kommuna er eisini komin so langt, at vit skjótt kunnu vænta at fáa ein verkfrøðing higar. Aðrar kommunur í Føroyum lata eisini granska, t. d. Klaksvíkar kommuna, sum hevur vent sær til eitt bekent ingeniørfirma í Køypmannahavn. Soleiðis eisini í Vági í Suðroy. Hotta er fyri at mótmæla tað sum er sagt, at einki er gjørt utan tað, sum hetta felagið hevur gjørt. Til tað sum sagt er um orkleringar frá ymsum kommunum kann nevnast, at eisini Havnarkommunna skuldi spyrjast eftir.

A. Samuelsen: Eg kann slutta meg til síðsta ræðara; serliga tá hann sigir at tað er kæðiligt, at vit í tinginum ikki skulu fáa tær upplýsingar, ið eru, og sum man hevur brúkt í nevndini fyri at fáa nevndarmenninar til at taka stilling. Tað er óforsvarligt. Men sæð burtur frá tí at vit føla at her eru upplýsingar, sum tingið einki má fáa at vita um, so er heilla sakin nok so vanskilig. Sakin hevur verið tvær reisur á tingi áður. Hon er væl ikki tann sama nú sum tá. Men nøstan. Hon er blivin størri. Men í hvussu er, er tað kæðiligt at vit ikki vita hvussu stór henda sakin er. Man plagar at vita hvussu nógvan pening tað ræður um; um 10 000, 30 000, kanske 2 mill. kr. Vit almindiligu tingmenn kunnu ikki fáa tað at vita. Og okkara nevndarmenn siga at teir ikki hava fingið loyvi at fortelja tað fyri tinginum. Hvat er hetta tó fyri ein mystisk sak. Skulu tingmenn ikki hava loyvi at siggja, hvat sum gongur fyri seg? Av orðaskiftinum ídag framgongur at sakin er vanskilig. Hon er gjørd til ein politiskan spurning, men ikki frá tí síðu sum eg hoyri til. Man sigir, at tekur man ikki ein persón, so verður einki av. Vit hava í 1910 malt til at gera okkurt við ánna Fossá. Eg vil anbefalla at vit fáa okkurt í lag; men eg vil ikki anbefalla handilsstudning til eitt almindiligt handilsselskap. Í plánunum í 1910 var týðiliga vekt lagt uppá at selskapið kundi knýsa binar handlarnar í Vestmanna. Tó vild u teir niðurláta seg til at svølgja einkultar av filialunum har. Tað vildu vit ikki ganga við til tá. Og heldur ikki nú. Nevndarorðførarin sigir at Effersøe stillar seg til sakina eftir persónligum grundum. Eg haldi, at tingmaðurin í Kirkjubø kundi lata vera at siga tað. Effersøe kundi svara Paturssom, at Paturssom er vinmaður Ó. á Heygum olla økonomisk interesseraður. Og um man grapskaði eftir, so eru kanske aðrir tað eisini. Eg havi einki móti manninum, men anbefalilsisverduga virksomheit hevur hann ikki gjørt í Føroyum. Nógvir av teimum, sum eru villigir til nú at anbefalla hann, hava ikki altíð umtalað hann so væl. Mortensen talar um at vit gera synd við ein mann, sum er dømdur. Men í 1910 var hann ikki dømdur. Og tá meinti mann, at

mann ikki kundi styðja sakina við honum sum oddamann. So las hrr. Patursson nakað upp úr einum bræv; hann las bert nakrar roglur, hann vil væl ikki geva okkum meira enn skeið av og á, vit skulu væl ikki hava meira av tí mixturi, hann hevur í lummanum. Tað framgekk av tí, hann las, at bankarnir vildu ikki styðja fyritøkuna utan studning frá statskassanum. Táið fyritøkan er soleiðis vorðin, at bankarnir ikki vilja taka undir, er tað so meiningin, at vit skulu fáa statin til at ganga í tovið? Tí táið staturin so seinni fer okkurt nonarbræv, ið verður styðjað av okkum, so vil staturin siga: í 1919 fekk løgtingið okkum til at ganga í tovið, nei, nú styðja vit ikki meira. Vit kunnu her á tingi ikki taka eftir sovorðnum bræva stubbum, sum Jóannes Patursson las, undin tað nú er frá fyringeniør Wædén ella tað er frá statsgeldsdirektør næstan heila alfabetið og so Andersen, vit kunnu ikki lata okkum bjóða sovorðnar stubbar, og utan fyri løgtingið mugu menn skilja, at her á tingi hava vit ongar upplýsingar, men í salinum sita menn, ið hava fult av upplýsingum, men teir vilja ikki út við tenum. Og eg kann ikki styðja hesa sak áður enn eg havi seð tær upplýsingar, sum J. Patursson sigur seg at eiga, sum Ó. á Heygum sigur seg at eiga, tí eg kann ikki stemma eftir tí, ið sigst at skula liggja í vestahummanum hjá J. Patursson. Tað er rímiligt, at staturin sigur, at teir vilja styðja útnýtsluna av vatnkraft í áum, fossum og vøtnum, harum sigist at fyriliggja eitt úttalilsi frá einum ministara. Um tað er so, at hetta selskapið skal hava eina ella tvær milliónir til at ráða yvir, so er tað ov nógv, vit mugu heldur innstilla, at tær kommunur, ið hava interessu av slíkum fyritøkum fáa lán ella tilskot frá statskassanum og ein slíkur hugsunarháttur má vinna tilslutning her á tingi, tí so verður tað ikki bert kommunarnar í Vágum og í Streymoy, ið fáa nyttu av hesum, men eisini allar aðrar kommunur, ið óivað seinni vilja hava slíkt í lag. So kann ein siga, at so kunnu tey eisini stovna felag og søkja sær studning, men eg haldi tað verður heilt ringt at fáa studning frá statinum til so nógv feløg, eg haldi, tað var betri at loysa sakina sum heild. Eg ætli mær at yvirveya um vit ikki til 3. viðgerð skulu stilla forslag um at forandra hetta til innstilling um at fáa tilskot frá statskassanum til tær ymsu kommunur. So vilja óivað eisini sjálvstýrismenn styðja hetta, tí teir halda jú altíð uppá tað kommunala, ein minnist sølu av prestagarðsjørð, at teir tá vildu geva kommunum forkoypsrætt, tað kann vera nikið gott, men tað kann eisini yvirdrívast. Eg hopi ikki, at tingmaðurin úr Kirkjubø meinar, at vit skulu styðja fyritøkur á ósunnum grundarlagi, hann hevðist at Edw. Mortensen, sum vildi hava sakina framda á sunnum grundarlagi. Eg skal leggja ansvarið á teir menn, ið hava upplýsingar, men ikki vilja geva okkum tær.

J. Patursson: Eg skal takka hr. Tórgarð fyri hansara úttalilsi um sakina, tað var tað sama, sum hann altíð hevur sagt yvirfyri mær framanundan, og eg vóni, at hann kann koma til at styðja sakina við 3. viðgerð. Hann fann at, at av fáar upplýsingar vóru til hesa sak, tað hevur eisini ein annar tingmaður talað nógv um. Eg havi ikki nakað innóti, at orðførarin fyri nevndini segði minnitalinum frá, hvat ið var upplýst í nevndini, men tað ber kanska ikki so væl til at bera alt fram á almennum fundi. Tað eru framlagd úttalilsir frá monnum, ið ikki vita, at tey skulu berast almenniliga fram, men fyri tað kunnu ørðførarin jú sagt partamonnunum sínum frá tnim upplýsingum, ið liggja fyri. Eg vil biðja hrr. Efferson lata partafelagar sínar vita, hvat ið er framkomið av upplýsingum, annars haldi eg ikki, at vit skulu hava allar fram á tingi. Táið onkur tekur upp, hvat ið var í 1910, so veit eg ikki um tað er atlaniin nú at stovna handilsfyritøku. Eg haldi kortini, at vit her á løgtingi ikki góðl kunnu fara og siga við formannin í hesum felagi, departementschef Andersen, at hann má ikki nerta við handil, tí harvið vil hann slúka og svølgja allar handlarnar í Vestmanna. Í 1910 var statsskuldsdirektor Andersen ikki uppi í, so hetta er í hvussu er ein rekonstruerað fyritøka. Eg trúgvi tí heldur ikki, at mangir vilja fylgja hrr. Efferson í hansara ógrundaða siktilsi móti hrr. O. P. A. Andersen. Táið hrr. Tórgarð sigur, at aðrar kommunur hava eisini granskað hetta, t. d. Tórshavn og norður í Vági, so eru tær granskingar kanska væl so lítið verdar: tað at goldið er fyri tær, er kanska tann størsta dygdin við teimum, tí tann maður, ið t. d. hevur granskað norður í Vági, hevur eisini granskað fyri búnaðarskulan, ið verða skal, men tær granskingar hava einki uppá seg. Tað var bert peningur út úr lummanum. Eg vil ikki tala meira, tí at fara undir slíkt sum seinasti talari kom fram við, havi eg ongan lug til.

R. Rasmussen: Eg segði nøkur orð við 1. viðgerð og framhelt eg tí, at tað vildi verið

gott, um vit hur á tingi og um staðarin høvdu vitað, hvussu nógvan elektriskan mátt her er nýtandi í Føroyum, táið verkið kemur í lag, og kanska eg vil gera inu broytingaruppskot horum. Minnitalið hevur bæði í nevndarálitið og í orðtun símum hur á tingi borið sakina óheldiga fram, tí teir hava knýtt hana óloysiligu til hr. Ólav á Heygum, hóast teir vita, at tað at knýta sakina soleiðis til ávísar persónar, ikki er henni til frama. Eg fati ikki, hví teir knýta hendla eina mann so fast til fyritøkuna, kanska tað er tí hann hevur skrivað heimarbrævið. Tað er so ofta her, at mangt kemur fram í nevndunum, sum ikki verður borið fram til orðaskifti á tingi, men kortini verður haft til umroðu á floksfundum, so tað má kunna leta seg gera eisini við hesum máli. Hví skulu vit ikki tala eins nógv um hinar báðar menirnar, hrr. Andersen og hrr. Wedén sum um hr. Ólav á Heygum? Hvor maður gongur á garð, har hann er lægstur, og tað tykist eisini at vera siður teirra hrr. Effersoes og hrr. Samuelsens. Tað kann jú vera, at hesum monnum eisini kann sokjast at og eg vænti nú, at sambandsmenn eisini vilja finnast at hesum báðum monnum, teir standa jú saman við hrr. Ólav á Heygum, og tað er ikki hann, ið er formaður í felagnum, men hrr. departementchef Andersen, sum tað áður hevur verið sagt her í dag. Fleirtalið tekur sakina reint ópersónliga; um onkur skuldi meint, at maðurin, ið ber sakina fram á ting, er eitt sindur óheldigur, so verður sakin eins góð fyri tað, og latum okkum ikki dona mannin harðari enn neyðugt. Tað raðnr um at fáa sakina framda til gagn fyri land okkara, tað einasta vit kundu ivast í her, er um vit kunnu fáa nógmiklan vatnsmátt, vit hava jú bert smáar áir og avfallið hevur so lítið land at falla á, at tað kanska ikki verður lætt at fáa nóg miklan mátt alt árið.

Eg vil slutta meg til uppskotið frá fleirtalinum og forbehalda mær rætt til at broyta tað í eina leið, sum eg halði vera hølduga, viðvíkjandi mongdini av kraft. Eg skal ikki gera persónlig álop á einkultheitir í tí, sum A. Samuelsen førdi fram nú síðst, tí vit kenna hvussu tað er at koma í orðadrátt við hann um persónlig ting. Tað er O. á Heygum, sum hevur fort hesa sak fram, og tað er sjálvandi at hann koyra vit ikki burtur úr.

R. Niclasen: Tórgarð spyr um tað er nevndini kunnigt at hetta selskapið hevur søkt um rætt til allar fossar og streymar í Føroyum. Slíkt er ikki komið mær fyri oyru. Hann helt at uppskotið frá fleirtalinum ikki var rímiligt og at eg segði tað at var ein klár handilsfyritoka. Hann hevur misfatað tað. Eg segði, at tað stóð í prospektinum at fyritokan var so góð at hon kundi forða fyri allari stedligari konkurrence. Tað er selskapsins plikt at seta sakina í so gott ljós sum tað kann lata seg gera. Og teir sum hava arbeitt hetta prospektið, eru ikki í selskapinum. A. Samuelsen hevur heldur ikki skilt, hvat har standur, tí hann sigir, at hetta selskapið skal slúka allar forretningsmenn í Vestmanna. Hetta eru jú fyritokur, sum skulu byrjast, men sum ikki enn eru komnar til; men tær kunna ikki væl byrjast um man skuldi borið frykt fyri stedligari konkurrence. Hetta er tankin við tí. Havn, sigir Tórgarð, kann ikki rokuast sum abonnentur. Tað vita vit. Havnini hava verið gjord fleiri tilboð. Men tað er Havnar býráð sum hevur meint, at tað ikki hevur vinning av at taka inóti teimum. Men eg vísti á at Havnin sveik sum abonnentur. Sjálvt um Havnin kann byggja elektricitetsverk, so kann hon í hvussu er ikki bjóða øðrum bygdum kraft. Havnin vil kannske heldur gera Rockefeller ella troloigarnar í Onglandi ríkari enn hon vil bíleggja sær kraft úr Fossá í Vestmanna. Men tað er ódámligt, at so skal vera vorðið. Havnar býráð hevur haft sína uppmerksomheit uppá at fáa elektricitetsverk. Men hava teir roynt seg fyri í Vestmanna ella aðrastaðnis í landinum? Tað verður væl motorur ella koladrift, teir skulu hava. Hetta er væl alt, sum fyriliggur har. — Tað kann sjálvandi væl kallast ein handilsfyritoka á ein hátt, hetta selskapið. Tað má vera ein maður, sum stendur fyri, og selskapið skal abonnera úppa hestakreftur til frystingarhús, sniðkarar og timburvaruverkstað og ullvarufabrikk og mylla, so at man kann flyta korn inn frá Svartahavinum og mala tað her, so at tann peningur, sum gongur til at fáa kornið frá korni til mjøl kann vinnast her í landinum. Í hesum virki skuldi eingin kunnu taka konkurrence upp móti selskapinum. Í hesum og tílíkum liggur sjálvanda tankin í orðunum: at udelukke Konkurrence. Á sama hátt t. d. við timbrinum. Stokkarnir verða skornir, viðurin høvlaður og tilgjordur her í Føroyum, so at hesar iðntøkurnar vinnast her í landinum. Tað er ikki gott at skilja, at man um tann Føroyingin, sum notup elskar tað industriella virksomheit, skal kunna siga, at tað er hann, ið fordar fyri at honda sak verður framd. A. Samuelsen sigir, at

hetta er ein mystisk sak. Tey pappír, hann talar um, eru lont pappír. A. Samuelsens menn hava granskað sakina so væl sum vit. Annars var hansara røða av tí anda at eg kann ikki meira tala um hana.

O. Effersøe: Det er rigtig, at R. Niclasen holder op med at tale. Uan er mulig. Det Selskab, som her søger om Statsstøtte, vilde i sin Tid drive Købmandsforretning, som skulde udelukke al Konkurrence. Der udtaltes: »Det er klart, at Vestmanhavn har de bedste Betingelser for Forretninger af større Omfang. Hvad er det for Forretninger? Der stod endvidere: »har de bedste Betingelser for at trække Folk til Købmandshandel.« Hermed er jeg færdig med R. Niclasen. Engang var Paturssøn med i Selskabet. Nu er der andre Medlemmer, men vel det samme Selskab. Det kan vi gaa udfra, skønt vi ikke har Bevisligheder. Men da maa disse Mænd ogsaa vide, hvad Sagen indeholder. R. Rasmussen holdt en længere Tale om, at Sagen var gjort personlig af os. Det Spørgsmaal er der talt saa meget om, og R. Rasmussens Tale giver ikke Sagen andet Indhold end, hvad den har haft. I 1910, den Gang, da der ikke var overgaaet Ó. á Heygum den Dom, som der har været talt om i Dag, da var det Forslag fremme, at Ó. á Heygum skulde være udenfor. Den Gang var der 18 Stemmer for, ingen imod. Det Paaskud, at man var bleven tvungen til at stemme derfor, kan ikke tages for gode Varer. Efter at Tinget paa den Maade havde taget Stilling til dette specielle Spørgsmaal, uden at der er sket andet, end at der er overgaaet Manden en Dom, saa lægger man Sagen igen ind for Tinget og kræver, at vi skal lægge Sagen for Rigsdagen. Det er Manden selv, som har gjort Sagen personlig. Modparten har benyttet dette til at fremsætte forskellige Uforskammetheder mod mig for at nære personlig Uvilje mod Ó. á Heygum. Jeg lægger større Vægt paa, at naar man ønsker at faa noget ud af Sagen, da skal man gøre den saadan færdig, at den ikke faar Hindringer paa sin Vej, men virkelig kan opnaa Statsstøtte. Jeg sagde, at jeg ikke tror, at man kan faa Sagen gennemført paa dette Grundlag i Rigsdagen, skønt jeg ikke har talt med nogen i Rigsdagen om det. Jeg kan ikke antage, at Sagen paa det foreliggende Grundlag kan faa Støtte af Regeringen. Lad os se, om det vil lykkes at faa Støtte hos Regering og Rigsdag paa det foreliggende Grundlag. Og skulde Sagen ikke faa Statsstøtte, saa vil jeg sige, at det var fordi de tog Sagen paa den Maade, at den blev gjort til et personligt Spørgsmaal. Vi skal undersøge, om Sagen er af den Art, at den skal faa Statsstøtte. Jeg tror ikke, at den foreligger saaledes. Der blev fremført imod os, at vi løb an der, hvor Gældet var lavest, og at vi ikke angreb Statsgældsdirektør Andersen og Ingeniør Widén. Om der var noget, som gav Grund til at angribe dem, saa vilde jeg ikke holde mig tilbage for den Stilling, de Herrer har. Intet i Sagen godtgør, at de Herrer har haft noget mod Sagens Indbringelse i Tinget at gøre. Om det er rigtigt, maa jeg sige, at de Herrer er dadelværdige og har taget paa Sagen paa urigtig Maade. Der blev talt om Oplysninger i Sagen, og Paturssøn erklærer, at man fra Mindretallets Ordfører's Side blev meddelt hans Partifæller, hvad der forelaa. De tekniske Oplysninger er ikke tilfredsstillende. Om jeg skal fortælle mine Partifæller noget, saa maatte jeg faa vedkommende Dokumenter udleverede og faa Tid til at overveje og behandle den. Og mine Partifæller maatte selv kunne se de paagældende Papirer. Det saa dog ud, som om Formanden for Udvalget ikke vilde ud med Papirerne. Der blev talt om Udtalelser fra en Minister. A. Samuelsen mente, at efter Udvalgets Anskuelse har en Minister sagt god for Sagen. Jeg vil bede Udvalgets Ordfører om at oplyse os om dette.

R. Niclasen: Hrr. Effersøe segði nú skák og kanska eisini skák mát, men eg taki ikki við hatta skák mát. Eg vil leggja hrr. Effersøe tey ráð at lesa sítt egna nevndarálit, og har vil hann siggja, at hann nú sjálvur standur skák mát og ikki eg. Effersøe má duga at fata, at hetta, ið nú liggur fyri, ikki kann setast í samband við annan handil enn tann, ið er í sambandi við elektriska máttstøðu. Eg skal við loyvi formansins loyva mær at lesa, hvat ið ætlanin var at stovna í 1910: »Selskabet paatænkte at drive forskellig industriel Virksomhed, hvorved Drivkraften fra Elven Fossa i Vestmanhavn agtedes benyttet til at udvikle Elektricitet, der skulde udnyttes dels til at levere Belysning og Varme til Vestmanhavn og Omegn, dels som Kraftkilde til forskellige industrielle Virksomheder — i første Linie et Fryseri, et Snedkeri og Tømrerværksted og endvidere til en Skibsbedding og en Uldvarefabrik«. Einki av hesum, hvørgin undantikin, finst í Vestmanna.

Effersoe: Punkt 1.

R. Nielasen: Punkt 1 hevur hrr. Effersoe lisið sjálvur, men tað sipar til eina heilt aðra virksomheit. Tað framgongur klárt av øllum, at hrr. Effersoe hevur aldeilis ikki skil uppá sakina. Hann helt nú oina drjúgva tala um hrr. Ólav á Heygum, um hvat hann hevur gjort fyri mongum árum síðani og nu oin dóm, ið or yvirgingin honum, men um tað arbeiði, hann hevur gjort síðani toirri tíð nevnir hrr. Effersøe ikki eitt orð. Eg sigi: tann ið er reinur, hann kasti tann fyrsta steinin, og skal ikki vera við til at døma hrr. Ólav á Heygum eina ferð enn.

J. Patursson: Nú hava bæði hrr. Effersøe og hrr. A. Samuelsen talað langt og breitt um hitt gamla uppskotið frá 1910 og um at hetta eins og tað skuldi tilsikta monopolhandil, udelukke enhver Konkurrence, sum hrr. Effersøe segði, kollega hansara nýtti meira óhevisk orð. Eg vil spyrja, um hann vil leggja hrr. departementchef Andersen og fýringenier Wedén undir at stovna fyritøkur við tí endamáli sat udelukke enhver Konkurrence. Eg vil spyrja hrr. Effersøe, um hann ikki kennir hesar menn sum tveir sera væl umhildnar og ratthugsandi menn? Hvorgin teirra er peningaliga interesseraður i Ólav á Heygum, teir vilja bert hjálpa einari góðari fyritøku fram í Føroyum. Hrr. Effersoe sigur, at teir hava ikki lagt sakina fram. Tað eru netupp teir, ið felagsins vegna biðja Ólav á Heygum leggja hana fram. Tað er óhóskandi at taka sakina á hendа hátt, altíð at skula royna at forða, táið nýggjar fyritøkur skulu stovnast, hvussu var t. d. ikki við búnaðarskúlanum, tá helt eisini hrr. Effersøe fram, at tað tjenti einki at stovna hann, tí har vóru so ringar royndir framanundan. Hr. Effersoe sigur, at »paa det foreliggende Grundlag vil Rigsdagen ikke fremme Sagen«. Vit biðja ministarun fremja sakina á tí grundarlagi, ið ministeriið vil ásota.

R. Rasmussen: Eg vil biðja hrr. Effersøe vísa á, hvørjir teir eru, ið krevja persónliga uppreisning fyri Ólav á Heygum. Eg kann ikki trúgva, at hrr. Effersøe talar á heilt leysum grundarlagi. Minnitalið vil geva ministaranum ein peikipinn viðvíkjandi manninum Ólavi á Heygum. Eg hakdi tað vera nærgingið. Er tað soleiðis, at hrr. Effersøe veit nakað um hvussu hin danski ríkisdagur vil fagna hesum? Fyriliggur yvirfyri hrr. Effersoe nakað áttalilsi frá fleirtalinum í ríkisdegnum um at teir vilja ikki fremja hesa sak? Táið hrr. Effersoe einki hevur at finnast at hesum monnum, hrr. Andersen og hrr. Wedén, ja so má hann viðganga at felagsnevndin er góð.

O. Effersoe: Jeg ser, at bl. a. Hr. J. Patursson har været med til at underskrive det Prospekt, der udsendtes i sin Tid, og hvori der tales om Købmandshandel. Jeg siger ikke, at d'Hrr. Wedén og Andersen kender dette Prospekt, men jeg siger, at de burde kende det. Man skulde heller ikke tro, at de kendte Lagtingsvedtagelsen fra 1910, hvis de kendte den, synes jeg, at det er urigigt af dem at bringe Sagen frem for Tinget i den foreliggende Skikkelse. Det er overflødigt af Hr. R. Rasmussen at spørge, om jeg sidder inde med Oplysninger fra Rigsdagen; jeg har tydelig sagt, at jeg ingen Oplysninger har, men at det er mit personlige Skøn. Jeg vil her sige et Par Ord om Referatet, jeg har sagt det samme før og maa atter fremhæve det, at Referatet først vil faa Betydning, naar der samme Dag kan foreligge enten Afskrift eller helst trykt Gengivelse af Ordskiftet. Jeg maa fremhæve det nødvendige i, at Ministeriet faar en Afskrift af Referatet, naar Sagen bliver sendt til Regeringen.

J. Patursson: Táið hrr. Effersoe sigur, at hrr. Wedén og hrr. Andersen eiga at kenna løgtingssamtyktina frá 1910, tí annars vildu teir ikki komið fram við hesum máli á hendа hátt, so sigi eg ikki, at teir kenna hana, men eg haldi, at vit eiga ikki at fara at snoðda í gomlum syndum, táið vit vilja hava frama fyri einari sak. Vilja vit gera nakað gott fyri sakin í, fara vit undir hana heilt av nýggjum. Eg haldi, tað var best bæði fyri hrr. Effersoe og sakina, ikki at koma inn uppá gamalt klandur, tað hevur spilt so manga góða sak.

R. Rasmussen: Eg havi verið í ivanum tað er sakin frá 1910, ið hrr. Effersoe talar um, ella sakin frá ídr. Tað er undir tí forútseting, at eg taki støðu til sakina, at vit arbeiða á einum nýggjum grundarlagi og ikki við sakina frá 1910. Tað er nú sagt bæði gjølla og títt. Táið hrr. Effersoe framheldur at tað hann sigur um sakina yvirfyri ríkisdegnum bert er hansara persónliga ætlan, so haldi eg, at vit kora at seta okkara ætlan upp ímóti hansara.

O. Effersoe: Vi kan ikke tage Stilling til

Sagen, saaledes som den eventuelt vil komme til at se ud, naar den kommer fra Regeringen. Jeg tror, at d'Hrr. Wedén og Andersen maaske vil se paa Sagen netop paa samme Maade som jeg, at det gælder om at ophjælpe Færøerne paa den mest hensigtsmæssige Maade. Jeg mener, at vi bør udsætte Sagen, udskyde alt det gamle og daarlige og medtage alt det gode og ny.

J. Patursson: Effersøe vil at vit skulu gera hrr. Andersen og lur. Wedén til vildar og samtíðis geva hansara uppskoti atkvøðu, tað uppskot, ið gongur út uppá at koyra tann mann frá, ið teir vilja hava.

A. Samuelsen: Eg havi nú hoyrt, at hrr. Jóannes Patursson er økonomisk interesseraður í sakini: hrr. R. Niclasen kundi væl sagt tað sama, og trír eru teir ídnastu talsmenn fyri hesa sak. So eg kann róliga siga, at tann økonomiska interessa er tað mesta, ið ger, at teir finnast at, at okkum ikki dámar teirra mann í felagsnevndini. Tað er ikki rætt at siga, at hrr. ingeniør Wedén er óskyldugur, tí hann hevur skrivað undir uppá at svølgja handlarnar í Vestmanna líka so væl sum hrr. Patursson, hevur skrivað undir; hrr. J. Patursson var uppi í í 1910, hann sigist nú ikki at vera uppi í; hrr. Wedén var við tá og hann er enn, hrr. Andersen var ikki tá uppi í, hann sigist at vera við nú. Eg veit ikki, um teir eru góðir handilsmenn, hrr. Wedén og Andersen, men eg havi dannað mær tað skjønn um teir báðar mennirnar, at bæði statsskuldsdirektør Andersen og hrr. Wedén eru interesseraðir í tí, at Ólavur á Heygum fær eitt álitistreysti frá løgtinginum, moralskt interesseraðir í at vit pynta hønda mannin, ið minnitalið vil halda utan fyri. Kanska teir eisini eru økonomisk interesseraðir, teir eru væl eisini aktionerar, síðani teir eru í felagsnevndini. Í 1910 søgdu vit, at vit vildu stýðja hesa fyritøku, um hesin maður, ið søkti, fór burtur úr. Síðani hevur hesin sami maður fingið ein dóm; eg haldi tað ikki kann vera nøkur anbefalling, so at vit nú skuldu vera meira fúsir til at tikið hann til leiðara enn í 1910.

Hann kundi syrgt fyri at hinir báðir mennirnir sendu andragandið til tingið. So hevði hann verið utanfyri. Fleirtalið er jú so megnandi, at teir kunnu føra sakina ígjøgnum. Og teir eru vissir í, at gongur sakin ígjøgnum her, so fáa teir hana ígjøgnum aðrastaðni við. Teir eru sikrir uppá ministaran, tykist tað, og kunske eisini uppá danska ríksdagin. Eg vænti altso at fleirtalið vil stemma fyri fleirtals uppskotinum. Og teir hava tá í hesum viðfangi givið andragarunum eitt tillidsvotum. Hann vil tá utanfyri Føroyar framstilla sakina á tann hátt at viðtøkan er eitt tillidsvotum til hansara. Soleiðis verður tað ivaleyst. Tað er hetta, tað ræður úm. Tað er tað sum Mortensen, Niclasen, Patursson og eisini Andersen og Wedén interessera seg fyri.

R. Niclasen: Tað er undarligt at tað eru A. Samuelsen og Effersøe, sum eru so forargaðir um orðini sat udelukke stedlig Konkurrence, tá forretningsmenninir í Vestmanna ikki ræðast tey. Teir anbefalla allir hetta elektricitetsverkið.

J. Patursson: Eg plagi ikki at svara A. Samuelsen aftur, tá hann melur á hesi kvørn. Hann hevur sagt, at Andersen, og Wedén vóru moralsk interesseraðir í at Ó. á. Heygum fær hetta ígjøgnum. Hvat byggir hann hetta uppá?

A. Samuelsen: At handilsmenninir í Vestmanna mæla við, tað upphevar ikki at hetta selskapið hevur til endamál at dríva keypmansforretning, sum útistongir alla konkurrence. Til Patursson vil eg siga, at eg úttalaði meg týðiliga og klárt iáðni, tá eg segði, at Andersen og Wedén vóru interesseraðir. Andersen og Wedén eru storkt moralsk interesseraðir í at Ólavur fær eitt tillidsvotum frá tinginum.

R. Niclasen: A. Samuelsen heldur at eg eri so torvæmur. Effersøe og A. Samuelsen eru enn meiri tornæmir. Tað tarvar í hesum máli at geva teimum av spónum.

J. Patursson: Eg fekk einki svar frá A. Samuelsen um tað, eg spurdi um. Hann byggir sítt úttalilsi á skjønn. Hetta er eitt groft briksl. Hvat byggir A. Samuelsen sítt skjønn uppá?

A. Samuelsen: R. Niclassyni skal eg ikki svara betýðiligt aftur, men biðja hansara partamenn at taka tingtíðindi og royna at fáa hann at skilja hvat har stendur. Til Patursson: Eg haldi at eg havi úttalað meg nóg týðiliga og eg leggi aftrat, at eg veit, at Ólavur hevur gingið runt og víðta við brøvum frá teimum og harvið fingið uógv fólk við sær. Nakað tilsvarandi er vist tilfeldi við Wedén.

R. Rasmussen: A. Samuelsen vil ikki viðganga, at tað er rett at minniluturin hevur drigið Ólav oneyðuga sterkt inn í hesa sak. Teir ersaka seg við at teir vilja hava hann burt. Teir útleggja okkara uppskot soleiðis at vit vilja frammheva at hann er uppi í. Hon vit hava fullkomiliga hildið okkum neutralar. At Ólavur er andragarin er fakta.

A. Samuelsen: Ólavur er bestýrilsislimur í selskapinum um tað skal byggjast á tað undirlag, sum lá fyri í 1910. Hann hevur undirskrivið prospektið, og hann er andragarin. Eg haldi at tit gera mannin alt for ringan, at hann ikki skal kunna takast uppá tunguna. Minniluturin hevur hildið at Ólavur ikki egnar seg til at vera bestýrilsislimur. Og tað varð meint fra báðum síðum í 1910. Meiningin er, at maðurin skal hava eitt tillidsvotum.

J. Patursson: A. Samuelsen letur nú til at byggja sítt skjønn á, sum hann sigir, at Ólavur hevur gingið og veitra við brovum frá Andersen og Wedén. Hvat innihalda so hesi brov? Tað má hann so greiðn frá. Tað má fyrst upplýsast.

R. Rasmussen: Tað er nóg væl avgjort, at Effersøe og A. Samuelsen hava drigið Ólav alt ovnógv framm. A. Samuelsen heystar eingi lavrber av tí hann sigir, at Ólavur ikki er so illa farin, at hann ikki skal kunna takast á tungu.

A. Samuelsen: Patursson vil hava upplýsing frá mær, men gevur ongar upplýsingar um sjálva sakina. Tað frumgekk av tí eg sogði, at Ólavi nýtist at fáa umbefalling til sín sjálvan. Annars kundi hann ikki fáa so nógv fólk við. Nú ein dagin talaði ein maður við meg um hesa sak og hann meinti at okkara landsmaður var tann minst verdugi av hesum trímum monnum. Tað má minnast at hesir báðir menn eru moralskt ansvarligir fyri, hvat Ólavur fyritekur sær.

J. Patursson: A. Samuelsen svarar mær ikki um hvat íð stóð í hesum brevinum.

A. Samuelsen: Eg haldi meg hava sagt, at brævið var ein anbefalling. At tað var ein anbefalling, er eingin ivi um. Eg vil ikki binda meg til bestemt úttrykk, tá nakað kundi ligið uftanfyri hjá Patursson. Hann fær meg ikki til tað.

J. Patursson: Hetta ger meg líka klókan, Íðina almindeliga anbefalling nýta vel hesir menn at hava loyvi at geva Ólavi. At tað skal liggja nakað undir — tað skal vel ikki vera tað brevið, sum fólkatingsmaðurin gekk og viftaði við í riksdeguum?

A. Samuelsen: Eg veit einki av slíkum bræv. Kanske landstingsmaðurin hevur haft tílíkt brev. Hann hevur í sínari tíð undirskrivað prospektið. Hann hevur vist verið ógviliga sterkt inni við Ólavi og Andersen.

J. Patursson: A. Samuelsen hevur nú viðgingið, at hetta sum hann brúkti til grundarlag fyri sínum álopi á Anderson og Wedén var ein anbefalling. Og tá hetta var grundarlagið, so fellur álopið heilt til jarðar.

A. Samuelsen: Patursson nýtir ikki at taka Andersen og Wedén í forsvar. Effersøe hevur hildið um at referatið av sakini skal sendast til ministeriið. Tá kunnu teir síggja hvat eg havi sagt. So at Patursson nýtir ikki at forsvara teir. Eg skal eisini sjálvur vera villugur at fara til teir.

N. P. úr Konoy: A. Samuelsen sigir at Ólavur í 1910 gekk við eini anbefalling frá Anderson. Fáa menn ikki anbefalling fyri at teir kunnu brúka hana? Meinar fólkatingsmaðurin at man ikki skal lesa anbefalling frá ábatsgeldsdirektør Andersen við tí orðaljóði, sum hon ljóðar á?

A. Samuelsen: Eg havi ikki funnist at Ó. á Heygum at hann hevur brúkt anbefalling frá Andersen, men segði, at Andersen er moralskt interesseraður í at Ólavur fær eitt tillidsvotum. Eg kann forstanda, at hann brúkar ta anbefalling, og brúkar hana nógv.

N. P. úr Konoy: Eg vrentaði ikki annað svar fá A. Samuelsen. Hann hoggur altíð niður við liðina. Eg spurdi um anbefallingin ikki var at byggja á. Tað var tað, hann skuldi svara til.

A. Samuelsen: Um Konoy hevði fylt við orðaskiftinum hevði hann forstaðið at grundin var, at Patursson spurdi, hvussu Andersen var moralskt forsvarligur fyri Ó. á Heygum. Tað var í tí forbindilsi, at eg nevndi anbefallingina. Konoy er ikki borættigaður at koma við tí spurningi.

J. Patursson: Eg meini ikki, at Føroya løgting skal taka imoti yvirfalli av slíkum nevnum. Eg eri tí fegin um at tílíkt mótmæli er komið framm á tingi. A. Samuelsen dámar væl at Ólavur fær eitt svart stempul hiðani.

A. Samuelsen: Eg havi úttalað meg soleiðis, at tað ikki er ivi í at Andersen og Wedén vilja skilja, hvat eg havi meint. Er tað ljótt at teir menn eru interessuraðir í Ólavi? Kann Patursson fara so illa við Ólavi? Eg taki einki aftur av tí, eg havi sagt. Kanske míni orð verða dokumenteraði við tvífaldari kraft.

J. Guttesen: Eg vil fult út taka undir fleirtalsins uppskoti. Fólkatingsmaðurin segði um hesa konkurrencu á staðnum, at hann skildi tað soleiðis, at keypmennirnir í Vestmanna ikki eru glaðir við at henda fyritøka komur í lag. Eg skal upplýsa, at 4 av handilsmonnunum í Vestmanna hava anbefallað hetta elektricitetsverk, og eg trúgvi at allir hinir eisini vilja gera tað, teir eru eingir bangnir fyri at verða slúktir ella gloyptir.

A. Samuelsen: Tað kann væl vera, at allir keypmenn í Vestmanna ynskja elektricitetsverkið, men eg veit ikki, um teir allir ynskja henda mannin á odda, ið her er tilætlaður.

H. C. W.-Tórgarð: Táið eg fyrst hevði orðið, spurdi eg eftir hvørjar upplýsingar fyrilógu; nevndarformaðurin segði, at tað bar ikki til at framleggja teir fyri tingimum. Vit kundu so haft hildið fund fyri læstum durum, tí tað hevur stóran týdning fyri allar tingmenn at vita alt, hvat ið liggur fyri um hetta mál. Min støða viðvíkjandi løgtingsins støðu yvirfyri kommununum er ikki ørðvísi nú enn fyrr í dag, men um har kemur eitt broytingaruppskot, kundi eg kanska givið tí atkvøðu. Eg skal siga, at tað skyldast ikki Havnar býráði, at vit ikki hava tikið støðu til sakina. Tað fyrikemur mær nakað undarligt, at hrr. Patursson sigur, at tær rannsóknir, ið eru gjørdar elektriciteti viðvíkjandi norður í Vági og í Hósvík, eru virðileysar. Tær eru kortini gjørdar av einum anerkendum firma í Keypmannahavn, firmainum Krebs. — Tað varð upplýst her við 1. viðgerð, at eina ferð fyrilá uppskot um eitt verk í Vestmanna, av hvørjum skuldi vinnast 60 h. k. Tað varð framhildið fyri okkum í Havnar býráði, at um vit her í Havn tóku deil í elektricitetsnýtsluni, so vildu teir gera eitt stórt verk uppá 1 000 h. k., annars eitt minni uppá 400. Nú seinni upplýsir hrr. Patursson, at tað eru 3 000 h. k., ið skulu útvinnast, og seinni at tað eru 4000 h. k. So eg veit nú ikki hvønn eg skal líta á, teir autoriseraðu verkfrøðingar, ið hrr. J. Patursson fram helt mótsett teir. ið høvdu granskað elektrisk verk norður í Vági.

J. Gudiesen: Eg má bodrova fólkatingsmannin við at siga, at allir keypmennirnir í Vestmanna eru á einum máli um at styðja lusa fyritøku.

J. Patursson: Tað kann vera, at eg fari skeivur í hesum og segði um verkfrøðingarnar, ið høvdu granskað norður í Vági, tað kann vera, at tað seinni er betri granskað, tann fyrsta eftirkanningin var utan nakað virði, so mikið fekk eg at vita í Keypmannahavn. Tað er heilt sjálvandi at h.-k. talið er komið upp í 4 000, tað er tí at Seyrvágsvatn er komið uppí, og jú hægri tað verður uppdammað, tess meira máttur fæst, men tess dýrari verður eisini verkið. Í nevndini fyriliggur av skrivilsum: upplýsingar frá verkfrøðingunum, ánarabrev, hvar ánarar láta grundina til Ólavs á Heygum ella felagsins, og so er har ímillum eitt brev frá ministeriinum til departementschef Andersen, um ta støðu, ministeriið kann ætlast at vilja taka til koncessiónina, men hetta brevið hildu vit vera so privat, at vit ikki vildu láta tað koma fram á opnum fundi.

Edv. Mortensen: Eg vil átala eitt ógrundað siktilsi frá A. Samuelsen móti hrr. Wedén og Andersen, nevniliga tað at hann sigur, at teir eru peningaliga interesseraðir í sakini og tossvegna styðja Ólav á Heygum. Minnitalið hevur tvinnandi atfinningar. Fyri tað fyrsta: at felagið ætlar at handla. Men tað er ikki talan um at styðja handilin, men elektricitetsverkið, um teir vilja handla umfram, verður teirra sak; staturin styðjar bert felagið yvirfyri elektricitetsverkinum. Hin atfinningin er at Ólavur á Heygum er við í felagsnevndini. Tað er ikki hann, ið søkir um studning, tað er eitt lutafelag. Tað er nakað nógv at krevja, at hann, ið eigur allan eigindómsrættin ikki skal hava loyvi at hava nakað við felagið at gera. Ólavur á Heygum er lutahavari í felagnum, og tað kann væl eingin seta honum forboð fyri. Ólavur á Heygum hevur ikki gjørt seg skyldugan í bedragari, hann er døndur eftir einari

aðrari paragraf. Eg veit ikki um teir harrar hava lisið dómin yvir hann, men hava teir ikki gjørt tað, hava teir als ongan rætt til at útlata seg herum, men eiga at lata ministeriið avgera um Ólavur á Heygum eigur at fáa koncessión ella ikki.

Th. M. Strøm: Tingmaðurin úr Havnini segði, at hann vildi heldur við til at fremja smærri verk runt um í Føroyum, heldur enn hetta stóra verkið. Eg vil spyrja hann, um hann heldur, at henda stóra fyritøka vil kova allar aðrar smáar fyritøkur. Eg trúgvi tað nú ikki. Hvat ið rættarin til at handla viðvíkir haldi eg ikki, at vit eiga til at taka hann frá felaginum.

A. Samuelsen: Hrr. Edw. Mortensen tosaði um Heygumsakina og spurdi, um vit kendu hana, tí hann kendi hana. Vit tosa ov nógv um hesa sak. Tað ið er avgerandi fyri mog, er at áðrenn nakar dómur fyrifá samtykti tingið, bæði sambandsmenn og sjálvstýrismenn, at stýðja sakina, táið Ólavur á Heygum fór burtur úr. At hann síðani hevur fingið ein dóm, skuldi væl ikki verið nøkur anbefalling. Eg havi ikki sæð nakað um at keypmenn í Vestmanna hava tiltredað at handilsfyritøkur skulu søkja statsstudning.

H. C. W.-Tórgarð: Eg skal til hrr. Strøm siga, at tað ið og havi talað fyri er kommunalum verkum, og eg helt, at táið vit lótu eina privata fyritøku søkja so stóran studning, vil tað kanska forða fyri, at staturin seinni munagott vil stýðja kommunal verk.

M. Samuelsen: Eg skal sum limur av nevndini siga, at eg eri heilt samsintur við ordførara okkara; tí táið ein hevur ein suvorðnan ordførara sum Effersøe, so hevur ein ikki stórt annað at gera, enn at játta tí, hann sigur.

Hettar er ein fella, teir hava sett fyri okkum. Men vit ganga beint igjøgnum felluna og bíta ikki í. Vit høgga okkum igjøgnum allar reinkur. Eg vil tó siga at um eitt broytingaruppskot kom framm í ta leið at kommununar kunnu meiri við enn her, so vil eg yvirteinkja mín stilling til tað. Annars gongur tað her sum so ofta, at hin gráhærdi vísdómurin lítið verður virdur.

J. Guttesen: Tað er sagt, at man einki kennir til anbefallingarnar frá Vestmanna forrøtningsmonnum. Tað kundi vera at eg var meintur at skuffa tær. Tað er ikki sagt, at tær eru so langt frá okkum.

Sákin fór til 3. viðgerðar.

Bomarbrav frá Kvívík.

2. viðgerð.

J. Patursson: Tað er komin umsókn um at tingið hyggur eftir hvat kraft sum er í Leynarvatni og Leynará og øðrum fossum og vøtnum og eisini hvat máttur ið vinnast kann úr ymsum streymum; streymarnir innihalda so miklan mátt at teir ikki verða útbygdir utan til stórri brúk; her eru jú hestakreftir at fáa í 100 000 tali. Vit hava sett uppskot fram til tingið um hetta. Fleirtalsins uppskot ljóðar uppá at fáa ein verkfrøðing higar til at granska hesar lutir, og eisini vilja vit at lógevingin í øðrum londum viðvikjandi tílíkum málum verður eftirhugd. Enn víðari at tað verður sett ein 3 mannanevnd til at samráðast við ministaran um hesi ting.

O. Effersøe: Der er ikke saerlig Grund til at gaa udførligt ind paa Sagen. Der er Forskel paa Flertallets og Mindretallets Standpunkt. Men dog har Flertallet aendret sit Standpunkt og kommet os nærmere. Fra vor Side vil man ikke udtale sig om Betydningen af Kraften i vore Elve og Strømme. Men det er rigtigt at iværksætte en Undersøgelse, og jeg er glad for, at Andragerne har rejst dette Spørgsmaal. Det maa føres videre. Vi har ønsket at man skal henvende sig til Ministeren for offentlige Arbejder og nedsætte et Udvalg til at forhandle med dette Ministerium. Med Hensyn til Oplysninger om Lovgivningen i de nordiske Lande er vi væsentlig af samme Standpunkt som Flertallet. Jeg skal dermed anbefale Mindretallets Forslag.

H. C. W.-Tórgarð: Eg skilji ikki munin millum tey bæði uppskotini, sum fyriliggja. Men eg vildi, at tað kom eitt tilføjilsi til uppskotini eftir ta leið at tær kommununr, sum longu hava utint nakað ella eru við at gera nakað, at tær fáa helmingin av teirra útreiðslum rindaðar aftur.

J. Patursson: Hesin síðsti spurningurin

hóskar ikki væl til okkara uppskot. Novndin hevur ikki meint at tað er neyðugt at fáa annað enn vanligar upplýsingar fyri fyrst og geva okkum setlan um hvat vit eiga í okkara fossum. Men tá kommununrnar skulu byggja út, tá skal granskast gjølhari. Og tá mugu kommununrnar og tingið kosta tað.

M. Samuelsen: Eg eri fegin at nevndin er samsint um at fremja hesa sak. Tað sær út í betonkninginum frá fleirtalinum at teir halda Leynará og Leynarvatn vera so óhentýðilig, at ikki fæst víðari kraft úr teimum. Leynarvátn er av teim størstu vøtnum í Føroyum, so at har má nógv kunna gerast burtur úr. Hetta má jú bliva undirsøkt, um nakar ingeniørur komur higar, og eisini tann streymurin norði hjá okkum, sum eigir eina so velduga kraft. Eg vil úppá besta máta umbefalla sakina.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Sjómarkið.

2. viðgerð.

S. P. úr Konoy: Her eru tvey bønarbrøv. Annað um at tingið vil royna at gera okkurt fyri at fáa rúmka sjómarkið. Og annað um tingið kann gera nakað, sum kann føra til at verja fiskin um Føroyar. Tað hevur verið nógvur fiskur í hesi tíð og tað verður hildið, at tað skyldast at trolarnir ikki hava verið her nú í næstum. Nú trolarnir eru afturkomnir, meina fiskimenninir at fiskiskapurin aftur vil minka. Granskingar um fiskin við Føroyar vísa at fiskurin her er støðufastur og má tí fornýggja seg sjálvan. Sakin er av stórsta týdningi fyri land okkara. Vit hava tess vegna borið uppskot fram, sum sipar til at tingið roynir, hvat það kann til at fáa rúmkað um sjómarkið og verja um fiskin í Føroyum. Tað skuldi nú vera í góðari tíð at hetta kom framm. Eg mæli til at tingið einmælt samtykkir hesa sak.

Poul Niclasen: Eg havi sum hinnur av nevndini ikki nógv at leggja aftrat. Ein heldugur loysningur av hesum spurningi er av stórsta týdningi fyri okkara fólk. Ein hópur av trolarum vilja søkja okkara fiskigrunnar aftur, og ein stórur partur av teimum liggja utanfyri 3-fjórðings markið. Tað er væl at ivast um, at ein slík sak verður framd á kongressini, sum nú verður hildin. Men vit mugu stilla okkara krav framm, tí betri leiligheit enn nú er, kemur ikki aftur í okkara tíð. Eftir tí sum frætt er frá kongressini forhandlast har millumfólkaligir spurningar. Eg skal loyva mær at umbefalla hesa sak og uppfordra tær myndigheitir, sum fáa við hana at gera, at greiða hana so skjótt úr hondum sum tað er gjørligt. Eg ynski at henda sakin verður send niður alt fyri eitt, so at utanríkisministarin kann fyritaka tað, sum neyðugt er.

M. Samuelsen: Eg vil umbefalla at henda sakin verður ekspederað skjótt. Hetta er tann viktugasta sak sum nakrantið hevur verið á tingi. Eg mæli til at allir einstemmuga samtykkja hana alt fyri eitt.

S. P. úr Konoy: Her tykjast vit at vera heilt samdir; at vit ikki tala so nógv er tí at vit eru samsintir í hesi sak.

M. Samuelsen: Ja, fullkomliga samsintir.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Keyp av dampskipi.

3. viðgerð.

M. A. Winther: Ígjár var talað so mikið um hesa sak, so at tað er væl ikki neyðugt at tala víðari um hana ídag. Fleiri tingmenn eru eisini nú burtursteddir. Til upplýsingar skal eg siga at sjálvfylgiliga hevur tað sitandi bestýrilsi latið representantarnar forstanda, hvat vit skulu brúka skipið til. — Tað kemur kannsko framm eitt broytingaruppskot, og vónandi komur tað framm í stuttum frá forslagstillaranum. Vit fáa so fyrst at hoyra hvat broytingaruppskotið sigir; tað gongur út uppá at seta sakina til Ólavsøkutingið. Eg mæli til at so verður stemmað: fyrst broytingaruppskotið, so minnitalsuppskotið og so fleirtalsuppskotið.

Formaðurin: Der er fremsat et Ændringsforslag, gaaende ud paa at udsætte Sagen til den ordinære Lagtingssamling.

Paul Nielsen: Orðtorarin umtalar, at hann vildi sett størri pris uppá, at minnitalsuppskotið ikki kom til atkvøðu, ella at tað kom fyrst. Eg minnist ikki betri, enn at vit nýta tann praxis fyrst at geva fleirtalsuppskotinum atkvøðu. Eg ætli mær at stýðja minnitalsuppskotinum og vil eg biðja aðrar tingmenn gera tað sama. Vit ynskja, at spurningurin skal fyriliggjast tinginum eina ferð enn; tað eru kortini 350000 kr. her skulu gevast av tingsins ogn, so eg haldi, tað vera beinast, at tingið enn eina ferð fær loyvi at útbýta seg.

A. Samuelsen: Eg kann ikki stemma fyri nøkrum av teimi uppskotum, ið eru frammi, og eg havi tí verið við til at framseta eitt broytingaruppskot um at útseta sakina til hina ordinera løgtingssetu. Tað eru tríggir saman við mær, og um vit ikki eru samsintir um annað, so eru vit samsintir í tí, at vit kanska kundu keypt gull ov dýrt. Í hini ordinera løgtingssetu hava vit betri stundir til at undirsøkja sakina og fáa at vita, um status okkara er soleiðis, at vit hava ráð til at ofra 350 000 kr. uppá eitt skipskeyp. Tað ið eg haldi, vit hava ráð til at ofra uppá hesa fyritøku liggur botýðiliga lægri enn hetta, og haldi, at um vit tóku aktiur fyri 40—50 000 kr., so hevdu vit tikið uppá okkum líka nógv sum mangar forrætningar, ið hava tikið aktiur. Eg vil absolut mæla til at løgtingsmenn stemma fyri hesum uppskoti.

J. M. Matras: Eg havi undirskrivað broytingaruppskotið, ikki tí at eg eri ímóti dampskipsfelagnum, men tí eg haldi ikki, at nóg nógvar upplýsingar liggja fyri; útseta vi nú sakina til Ólavsvøku, kann sakin kanska tá liggja fyri so mikið upplýst, at keypið kann fáast í lag alt fyri eitt.

D. J. Thomsen: Broytingaruppskotið er soleiðis vorðið, at tað tykist at siga, at Føroya løgting eigur ikki at stýðja hesa sak; tí útseta vit hana til Ólavsoku, so útseta vit hana eitt ár, og í einum ári kann nógv missast. Land okkara treingir til minst eitt stórt farmaskip, og netupp nú í hesum tíðum, tá øll veraldin vil hevda sín existens, eiga vit at royna at skipa eitt sindur sjálvur fyri okkara viðurskiftum. Tað hevur verið skotið uppá, at vit hava ikki ráð til at lata henda pening, men eg má spyrja, um Føroya fólk hevur betri ráð til at lata allar hesar hundrað túsund kr., ið vit nú lata út av landinum fyri frakt, og sum vit vilja halda við at lata um vit ikki fáa okkum skip sjálvir. Eg haldi, at hetta keyp vil gera okkara peningaliga status betri. Eg trúgvi, at tað verður tvørligari fyri okkum at fáa skip nú eftir krígnum, tí táið allar tær fyritøkur, ið hava ligið stillar undir krígnum, skula setast aftur í verk, so krevjast mong skip og allir vilja vera fyrst. Eg havi ta trúgv, at vit kunnu hava álit á tað firma niðri í Danmork, sum felagsnevndin hevur vent sær til, men eg haldi kortini, at vit mugu senda okkara mann at sýna skipið, táið tað verður keypt.

O. Effersøe: Jeg kan i visse Henseender være enig med Hr. Thomsen, i andre ikke. Naar jeg nu udtaler mig, saa er det fordi der i hans Udtalelser er noget i den Grad urigtigt, at jeg ikke kan holde mine Udtalelser tilbage. Han sagde, at dette vilde forbedre Amtskommunens Stilling. Spørgsmaalet er, om Indtægterne ved Skibet vil overstige Udgifterne; det kan man ikke vide paa Forhaand, man kan have Haab derom, men jeg vil ikke sige mere herom. Jeg kan ikke stemme for Ændringsforslaget; jeg har været med til at stille et Forslag, og det vil jeg stemme for, skønt jeg gaar med med stor Betænkelighed. Lagtinget kan altid blive sammenkaldt i Anledning af denne Sag, og jeg vil henstille til Medlemmerne at betænke sig nøje, inden de tager Stilling.

D. J. Thomsen: Táið vit keypa eitt gott skip hava vit fullan valuta í skipinum, og eg forútseti, at hetta verður ein rentabol fyritoku, ið vil geva okkum inntoku aftrat.

R. Rasmussen: Hr. Poul Nielsen sagði, at løgtingið skuldi missa, at skipið, vit fingu, var hóskandi fyri okkum, tað kann løgtingið ikki gera, tí vit mugu til slíkt hava menn fyri okkum, so eg haldi, at hrr. Poul Nielsen skal lata hesa ásjón fara og geva fleirtalsuppskotinum sína atkvøðu.

Poul Nielsen: Vit kunnu ikki koma burtur frá tí, at sakin enn er ov lítið upplýst. Mín meining var, at táið tingið aftur varð samankallað skuldu vit hava fingið fulla greiðu á einum skipi, sum vit so kundu keypt.

M. A. Winther: Vit vilja ikki binda okkum til hetta eina ummælta skipið, men vilja geva felagnum frían hendur til at keypa eitt skip, ið hóskar til fartin.

Poul Nielsen: Eg havi fingið tað ahsoluta inntryk, at tað ikki var hetta skip, ið tað nú var tala um at keypa.

A. Samuelsen: Eg havi motiverað broytingaruppskotið m. a. við tí, at tað av øllum frangongur, at honda sak var ikki tann, ið gjørdi, at løgtingið var samankallað. Men at tað vóru nógvar aðrar sakir, ið vóru orsøk til tess.

M. A. Winther: Vit hava sagt í nevndini, at upplýsingarnar um skipið eru ov fáar, tað kann vera at tað er nýtandi, tað kann vera at tað ikki er tað, men hesum halda vit at felagið skal fáa greiðu á. Tað kann væl vera, at skipið, táið gjølla verður kannað eftir, vísir seg nøkupp at hóska fyri okkum.

Edv. Mortensen: Tað hevur verið hildið fram, at tingið var kunnið saman fyri at keypa eitt ávíst skip, tað trúgvi eg ikki; tann kunngjørslan, ið kallaði tingið saman, sigur: stil Køb af et Dampskib«. Eg kann ikki trúgva, at løgtingið skal siga: tit skulu koma við einum ávísum skipi, vit geva so og so nógv. Tað er ógjørligt fyri eina alnenna forsamling sum hesa at sita og keypa skip, tað má gevast øðrum upp í hendi. Táið tað var tingið, ið skuldi avgjørt keypið av einum ávisum skipi, so kundi tað væl borið á, at áðrenn tosið herum á tingi var liðugt, var gingin so long tíð, at skipið fyri langtsíðani var selt.

O. Effersøe: Jeg har været Medlem af Udvalget. De Oplysninger, man fik om dette Skib, var meget mangelfulde. Indenfor Rigsdagen er det en Fremgangsmaade: Naar man vil have Bevilling, saa har man en Plan, saa at Rigsdagsmændene kan sætte sig ind i Sagen. Jeg kender ikke til Køb af Skib. Der burde have været forelagt en bestemt Plan, hvad der ikke er.

H. C. W.-Tórgarð: Eg vil siga hvussu eg ætli at stemma í hesi sak. Eg stemmi fyri minnitalsuppskotinum. Tað hevur verið framhevað um tann stóra týdning henda sak hevur fyri land okkara. Tá eg stemmi fyri minnitalsuppskotinum, er tað av teirri atvold, at eg ikki haldi meg hava rætt til at stemma fyri einum tilskoti frá tinginum á annan hátt enn uppskotið er í minnitalsuppskotinum. Viðvíkjandi úttalilsum frá nevndarorðførarunum um avstemmingina, so fati eg ikki tann máta, hann nubefallar at stemma uppá. Tað er natúrligt at stemma fyrst um fleirtalsuppskotið, tí tað er mest váttgangandi. Tað uppskotið vil eg ikki stemma fyri.

J. Gulløsen: Eg ætli mær at stemma fyri fleirtalsuppskotinum. Vit mugu fáa hesa sak frá hondini í hesi tingsetu. Tórgarð helt, at fólk vístu ikki stóra interessu í aktiutøkningini. Jú. Tað er teiknað meir enn ein kundi vænta og einans í stuttari tíð. Tað tykist sum um tingið vildi siga at tað ger tað sama um okkum vantar skip, tá vit tó fáa varur til oyggjarnar. Tað dugi og ikki at skilja. Síðani er tað tað, at vit hava her eitt dugandi fiskifólk, men fáar sjómenn. Tað var gott um vit kundu fáa útdanna ein sjómannsstand sum ikki nýtist at fara til onnur loud. Tað eru menn, sum hava hug at vera á sjónum, um teir ikki leggja í at fara út og fiska.

H. Samuelsen: Eg skal siga, at eg havi sett fram broytingaruppskot og ætli at stemma fyri tí, tí eg haldi sakina ikki vera so fult upplýsta, sum hon eigir at vera. Vit fyrigríja einki um vit seta sakina út til næstu tingsetu. Til ta tíð kundu vit fáa betri upplýsingar. Hesir menn eru skjótir at kalla sama til ekstrasamling. Tá ein er komin heim aftur til sín sjálvan, so noyðist man avstað aftur.

M. A. Winther: Heldur síðsti røðarin at tað er heilt til ónyttis at hann er komin til hesa samkomu, um tað ikki bara er fyri farmaskipið. Tað er eisini undarligt at tala um at vit hava loyvt okkum at kalla tingið saman - - sum um tað var eitt hrotsverk, vit hovdu gjørt.

H. Samuelsen: Vit hava avgjørt eina viktuga sak - - sjómarkið. Men ter viktugu sakirnar skuldu teir sett á dagsordanin.

Fleirtalsuppskotið varð samtykt.

Fundur fríggjadag 31. januar.

Bønarbræv frá O. á Heygum.

3. viðgerð.

J. Patursson: Tað hevur verið so mikið orðaskifti um hetta ravnagnsmál, at ikki man stórt koma fram av nýggjum aftrat. Eg vil tí mæla tinginum til at taka við uppskoti fleirtalsins.

O. Effersøe: Jeg kan slutte mig til, at der er sagt saa meget om Sagen, at der er ingen Grund til at komme ind paa nærmere Drøftelse. Men jeg maa fastholde, at Mindretallets Forslag baader Sagen bedst.

H. C. W.-Tórgarð: Tað vil framkoma eitt broytingaruppskot frá 4 tingmonnum og haldi eg tað vera so vorðið, at allir tingmenn kunnu geva tí atkvøðu.

J. Patursson: Mær tykir lógið, at eitt broytingaruppskot verður blakað inn í eina so týdningarmikla sak beint áðrenn vit skulu til at geva atkvøðu.

O. Effersøe: Det er selvfølgelig uheldigt at faa Ændringsforslag saa sent, men er det let overskueligt og oplysende, kan det være paa sin Plads. Jeg vil bede om at faa Ændringsforslaget læst op.

J. Guttesen: Eg skal um formaðurin loyvir tað, loyva mær at lesa upp eitt úttalilsi frá keypmonnum í Vestmanna. (Upplestur:

Guttesen, Lagtinget.

Olaf á Heygums Andragende om Lagtingets Bistand til Statsstøtte til A/S. Føroya Handil og Industri til Anlæg af Elektricitetsværk anbefales paa det varmeste.

I. O. Hansen, Kbmd. Poul Olsen, Kbmd.
I. I. Durhuus, — M. Nielsen, —
John Olsen, —

Vestmanhavn $^{30}/_{1}$ 1919).

Hetta eru allir handilsmenn í Vestmanna utan hrr. Reinert, og honum trúgvi eg, at hrr. Effersøe hevur sæð eitt gott viðmæli frá í nevndini. So havi eg fingið upplýsing um, at hrr. Mikkjal Samuelsen hevur fingið brøv frá partimonnum sínum í Norðstreymoy, har teir biðja hann styðja hetta mál.

O. Effersøe: Vi har nu diskuteret denne Sag saa udførligt, og jeg tænker, at enhver Lagtingsmand vil tage Stilling til den ud fra den foregaaende Diskussion og ikke ud fra noget som helst andet. Hvad Hr. Guttesens Oplæsning angaar, saa manglede der Oplysning om, hvordan disse Folk, der har underskrevet, er blevet oplyst om Sagen. Jeg har den Opfattelse, at naar Folk i Vestmanhavn og paa Vaagø støtter Sagen, saa er det kun for at faa Elektricitetsværket i Gang og faa de Goder, deraf følger, men de har ingen som helst begrundet Mening om de Forsog, vi her vil have gjort paa at gavne Sagen i sin Helhed. Dette er et af de gammelkendte Forsog paa at benytte uansvarlige Personer udenfor Tinget til at fremskynde en Afgørelse. Lad os selv tage Ansvaret og ikke tage andre Hensyn end de rent saglige.

J. Patursson: Eg skilji ikki, hví vit her skulu standa og finnast at, táið ræðiligir menn utanfyri tingið koma og biðja tingið styðja einum máli. Við tað sama kemur ein tingmaður og sigur, at sjálvandi eru teir bert reiðskap fyri onkran, ið hevur lokkað teir til at skrivað undir. Hetta er lógið at hoyra av hrr. Effersøe. Hann kundi tikið eitt dømi uppá fólk, ið vóru lokkaði til at skriva undir; tey ið hava undirskrivað tolkadressuna til hrr. Rytter, munnu tey øll gruna at tey skuldu nýtast sum reiðskap til álops á ministeriið?

J. Guttesen: Ein er her í salinum so vanur at hoyra, at vit sakna upplýsingar. So haldi eg tað vera lógið, at táið eg komi við upplýsingum, so virðir hrr. Effersøe tær einki. Hrr. Effersøe sigur, at hesir menn eru býttir og vitleysir, tað fer at standa fyri hansara rokning.

M. Samuelsen: Eg frágangi ikki, at og havi fingið brøv fra sambandsmonnum í Vestmanna um at styðja elektricitetsverkið, men eg haldi, at eg má eiga mítt privatbrøv sjálvur, og fyrr enn teir, ið hava upplýsingar um hetta mál, hava framlagt øll teirra privatbrøv, framleggi eg heldur ikki mítt. Teir sambandsmenn, ið hava sett nøvn teirra undir brævið, teir akti og æri eg, men eg trúgvi, at teir vilja halda, at eg havi gjørt beint. Eg havi roynt at fremja hetta mál á besta hátt, men at

fúa Ólav á Heygum sottan á odda, tað vil og ikki. Tað er eitt ósunt grundarlag.

Formaðurin: Jeg skal oplæse Ændringsforslaget fra de 4 Medlemmer.

O. Effersøe: Jeg erfarer, at Guttesen har lært noget i den Tid, han har været i Tinget, — et Trick, som vi faar se oftere benyttet i Fremtiden. Han undlader at give sagligе Oplysninger. Endvidere har han lært et andet Trick. Det er at formaa nogle Personer til at fremsætte en Udtalelse. Lad os fremstille Sagen som den er og ikke anderledes. Det, som jeg har fremdraget, er, at vi ikke ved, paa hvilket Grundlag de Mænd, som her er Tale om, kendte til, hvad der før er foregaaet i Tinget. Patursson talte om Underskrifter. Jeg vil dertil sige, at man skal være varsom at underskrive Udtalelser, som cirkulerer rundt. Underskrift er berettiget, naar de Personer, som underskriver, kan bedømme, om det er fuldt værdt at underskrive. I dette Tilfælde har man givet fuld Besked. Der er ingen ført bag Lyset.

J. Patursson: Eg skal ikki lara í orðaskifti viðEffersøe. Men tað er skeivt, sum hann hevur aumført um undirskriftir um hetta eina punkti. Til M. Samuelsen: Tað fyriliggja eingi offioiel brov. Hann eigir at vísa tað brævv, ið hann hevur fingið, til nevndina. Tí hon eigir at fáa upplýsing. — Tað broytingar uppskotið, sum framm er komið, er eitt av teimum merkilagastu dokumentum, sum nakran tíð eru løgd framm á tingið: Fýra løgtingsmenn biðja statin geva tiltrongdan peningastudning til føroyskar kommunur viðvíkjandi elektricitetsverki, utan at tað fyriliggur eitt einasta tal um hvat tað betýðir fyri statin olla okkum, um tað ræður um eina hálva ella kannskc um 20 milliónir krónur. Ikki eitt orð um tað. Hetta er tó beint móti allari forrætningsgongd og beint móti allari tinggongd. Tá vit skuldu hava telefon og havnir, hugsaðu vit tó um, hvat tað vildi kosta. Hetta dokumentið má fella burtur av sær sjálvum.

J. Guttesen: M. Samuelsen sigir, at hann hevur fingið hetta brævið og sigir, at Ó. á Heygum ikki er nevndur í brævinum. Eg vil spyrja um Ó. á Heygum ikki er nevndur? Hrr. Effersøe helt, at hetta elektricitetsverkið kom at slúka allar handilsmenn í Vestmanna. Eg hugsaði tí at tað var vert at vita um tað var so. Og nú eg havi gjort tað — nú er ongantið verri.

S. P. úr Konoy: Formaðurin fyri sambandspartinum heldur røðu um at tá fólk skrivar okkurt, so hevur tað við hvørk betýðning, við hvørk ongan betýðning. Tá nú ein tingmaður hevur fingið eitt bestemt telegramm, so hevur tað ongan betýðning, sigir hann! Hvat meinar hann t. d. um at sambandsmenn hava brúkt mítt navn til at fáa undirskrift á eina adressu til Ryttor. Men teir smæðast ikki at siga um navngitnar menn í Vestmanna, at teir hava verið anboð til at verja ein bestendan mann. Tann formaningsrøða, sum Effersøe heldur til tingmannin í Vestmanna, mátti hann heldur hildið inni hjá sær sjálvum. Sambandsmenn skulde heldur stangið hendurnar í sín egna barm. Tað gleðir meg, um tingmaðurin í Vestmanna kundi læra sambandsmonnum kunstin av. Eg eri fegin at hann tók sær fyri at gera tað, sum hann nú hevur gjort. Eg skilji tí at M. Samuelsen ikki vil vísa sín pappír framm.

A. Samuelsen: Eg havi sett broytingaruppskot til sakina. Sakin um at styðja elektricitetsverk í Føroyum er so, at tað ikki kann yvirskoðast. Vit biðja um at fáa undirsokilsi sett í gongd. Patursson meinti at mítt broytingaruppskot var eitt merkiligt dokument av tí, at man ikki sá hvussu nógv statnrin skuldi styðja. Men í tí uppskotinum sum er framm frá Heirtalinum stendur einki um hvussu nógv statnrin skal bloða. Tí kunnu vit við eins góðum rætti venda hesi orð til teir. Um vit samtykkja hetta broytingaruppskotið, so vil man fáa at vita um statskassin vil styðja útnyttilsi av vatnkraftini í Føroyum til kommunurnar. Tá man hevur útkalilsi frá myndigheitunum, so vilja kommunurnar kunna taka sakirnar upp. Hetta fordar heldur ikki fyri at elektricitetsverkið í Vestmanna kann ganga javnsíðis við hesi sak. Tað er soleiðis, at kommunurnar avgjørt fáa fyrsta rætt til at fáa stuðning frá statinum til at útnytta vatnkraftina. Tingið vildi tí gjørt væl í at ganga við mínum broytingar uppskoti. Eg ivist ikki í at fólk í Vágum og Vestmanna vil hava elektricitetsverk. Men fáa tey tað eins væl við kommunala hjálp, so vilja tey heldur hava tað soleiðis. Vit vita jú at tingmenn eru økonomisk interesseraðir í at Ó. á Heygum fær tilskot. Teir eru økonomisk interesseraðir í at tað verður sum fleirtalið vil. Vit kundu ynskja at sað pappír, sum

hava verið skrivað millum Ó. á Heygum og fleiri menn. So vildi tingið sað okkurt forvitnisligt, sum vildi forklára mangt og hvat. Hví koma teir ikki framum við protokollini? Telefontelegrammið úr Vestmanna virði eg nógv. Fólk í Vestmanna og Vágum eru ógviliga interesserað í at láa vatnið har útnyttað. Men eg meini at sakin kom meiri til almenna gagn um vit taka hana so sum broytingaruppskotið sigir. Um mun slær inn á tann veg, at tað skal vera til eitt handilsselskap, so er tað minni heldigt. Um tað ikki verður av komununum, so verður væl ikki gjørt stórt til útnyttilsi av vatukraftini í Føroyum. Elfersoo úttalaði seg ikki soleiðis sum ynsir aðrir vilja hava tað til, tað vil siga: niðursetandi, um hesar menn úr Vestmanna. Konoy sá ógviliga ambráður út, hann heldur eg nokk vera ein penan mann. Men tað er Elfersoe eisini. Eg vil ikki tala um hvussu undirskriftir vera framskaffaðar; men eg eri ikki sikkur fyri øllum teimum undirskriftum, sum Ó. á Heygum hevur givið, ikki heldur fyri øllum teimum undirskriftum, sum Patursson hevur skaffað. Eg eri ikki í iva um at teir menn úr Vestmanna standa inni fyri tí, sum har er sagt. Men tað nýtist ikki at skaffast bevís, tí tað kann ikki nótbevísa tað, sum Guttesen vildi nótbevísa. Tað eru kanske fleiri menn í Vestmanna, sum siga at tað er líkagyldugt: Lat teir bara konkurrera okkum sundur og saman. Eg ætli at sambandsmenn eru so klókir at teir ikki trúgva tí, sum stendur í prospektinum. Selskapið sigir, at teir eru mentir til tað. Men eg havi aldrinn trúð tí. Eg havi aldrin trúð uppá hetta selskapið, tí hasir menn, ið standa á odda, hava víst seg at vera ógviliga ódugandi sum forrætningsmenn. Ingeniør Wedén hevur verið fýriingeniør; at hann skuldi hava víst serliga góðar evnur sum forrætningsmaður, veit eg ikki. Andersen skal vera í felagnum, vit vita einki sum helst um tað, tey brøv, ið skuldu prógva tað, krógvast fyri okkum, vit skulu bert trúgva, at Hr. Jóannes Patursson hevur lummuan fullan av prógvum. Eg skilji væl at baggi nín, tingmaðurin úr Norðstreymoy, ikki vil framleggja síni privatbrøv, tí hesir menn, ið hava skrivað til hausara, teir eru menn fyri sín hatt, teir høvdu torað at skriva til løgtingið, um teir vildu haft sakina framda. Táið hrr. J. Patursson samanliknar hetta brævið úr Vestmanna við adressuna til amtmann Rytter, so er tað heilt ørt. Um hrr. Jóannis Patursson hevur skrivað undir, kann hann jú biðja amtmann Rytter geva sær navn sítt aftur, sum hann plagdi at biðja Ólav á Heygum. Teir, ið skrivaðu undir adressuna til amtmann Rytter, koma óivað ikki fyri rættin, sum synir komu, ið skrivaðu undir pappírir hjá Ólavi á Heygum. Eg vil vóna, at allir geva broytingaruppskotinum atkvøðu. Vit vita ikki, hvorjir eru aktionerar í felagnum, vit kenna ikki herokningarnar, tær eru kanska gjørdar av aktionerum í felagnum, teir hava kanska roknað sær tvær reisur tað tilskot, ið krevust. Um uppskot okkara verður fylt, vilja kommunurnar fáa tilskotið, eg veit ikki hví vit nú skulu monopolisera fyri summi feløg.

M. Samuelsen: Tað kann ikki krevjast, at eg skal leggja eitt privat brøv fram sum eitt aktstykki, tí tað eru ongar upplýsingar um sakina í einum slíkum privatbrævi. Hrr. Guttesen spyr um Ólavur á Heygum ikki er nevndur í brævinum, tað kann eg ikki svara soleiðis uppá; hann er nevndur, tað er jú ikki gott at koma undan at nevna hann. Hetta telefontelegrammið, ið Guttesen las upp, skal óivað brúkast sum politikk ímóti mær í Norðstreymoy, men eg trúgvi hestum monnum, ið eru meiningsfelagar mínir, so væl til, at táið teir fáa sakina at vita, so sum hon er, so siga teir: hann kann ikki hava handlað orðvísi. Eg eri ógviliga varsamur við undirskriftum og ikki sum Ólavur á Heygum; tí hvussu tað var vorðið við hansara undirskriftum, tað skal eg ikki taka upp aftur her. Eg má mæla øllum tingmonnum til at geva broytingaruppskotinum atkvøðu teirra.

R. Niclasen: Hrr. A. Samuelsen dregur altíð hetta fram: at menn eru økonomisk interesseraðir í sakini. Táið nú hrr. Samuelsen finnst at, at ein áhoyrari segði sær hertil, so skal eg rættleiða honum eitt sindur, tí maðurin, ið segði sær stóð undir liðini á honum, og maðurin var Rasmus Niclasen.

J. Patursson: Vit hava eina gátu her í Føroyum, ið ljóðar soleiðis: eftur við eygunum, spýr við liðini, og vita vit allir, at hetta er ein kvørn. Vit hava haft eina sovorðnan kvørn, ið hevur skrutt her á allan morgun, hon hevur skrutt so ógviliga groft, at tað er ómøguligt at fáa hampiligan dýl burtur úr meldri hennara. Eg skal tí einki mæla til hesa kvørn. Eg havi fingið at sað, at í brævinum frá Vestmanna stendur:

I dette for Samfundet saa vigtige Anliggende bør ikke Partistridighedor gribe forstyrrende ind. Aldeles fraset partipolitiske Hensyn bør Olaf á Heygum støttes i dette hans utrættelige Arbejde for denne gode Sag.

Tað hevur týdning fyri tingið at kenna, hvat hesir menn meina um sakina. Eg havi ikki framlagt hetta brævið, men bert sagt frá, hvat í tí stóð.

J. Guttesen: Eg haldi eiki var í tí, sum fólkatingsmaðurin segði, ið mótgekk mínum orðum. Her stendur í brævinum: Ólaf á Heygums Andragende om Elektricitetsværk støttes paa det bedste. So roynir fólkatingsmaðurin at misteiukiliggera bæði eitt og annað, ein skal ikki kunna trúgva bæði einum og øðrum, ja, hann segði beint út, at telefontelegrammið hevði eiki at týða. Ja, lat tað vera hansara meining, eg skal ikki siga meira herum.

Th. M. Strøm: Eg havi hoyrt framhildið av sambandsmonnum her á tingi, tá teir vóru í fleirtali, at sjálvstýrismenn oyddu tingsins tíð; nú undrar tað meg at siggja tað mótsatta, hrr. Andrass Samuelsen kemur fram við einum slíkum orðastreymi um tað sama og sama uppaftur, so eg haldi tað vera løgið, at teir vilja oyða tingsins tíð á honda hátt.

S. P. úr Konoy: Eg haldi tað vera ósømiligt av fólkatingsmanninum, at hann tekur undur, táið flokksformaður hans, hrr. Effersøe sigir um nógvar menn í Vestmanna, at teir eru nýttir sum reiðskap fyri ein ávísan mann. Annars má eg siga, at eg haldi tað vera beint, at tingmaðurin úr Norðstreymoy ikki vildi framleggja eitt privatbræv, og tað var væl ikki beint av hrr. Jóannes Paturssøn at upplesa tað, hann gjørdi, men at fólkatingsmaðurin skal harmast um hetta, haldi eg vera nakað nógv avgjørt, tí gjørdi hann ikki allar Føroyingar bilsnar, táið hann í heyst í fólkatinginum framlegði eitt privat bræv frá Føroya prósti, tað var so ósømiligt at ei var undur í, at vit allir blivu heilt kaldir, táið vit í heyst frættu, hvat hann hevði gjørt.

Nyholm Debess: Tað er at beklaga, at orðførarin fyri minnitalinum smoyggir sær burtur so vit ikki kunnu fáa hann at svara. Annars vil eg siga, at hrr. A. Samuelsen ígjár var ógviliga eymur um keypmenninar í Vestmanna, at teir ikki skuldu verða slúktir. Táið nú teir somu menn koma fram og siga, at teir eru ikki bangnir fyri at hava hrr. Ólav á Heygum á odda, so ger hrr. A. Samuelsen tað, hann er vanur at gera, han loypur við síðuna av. Hrr. Mikkjal Samuelsen talar um aktstykkir mótsett privatum brøvum. Nú er upplisið eitt petti av einum brævi, og harav framgongur, at hesir menn biðja um at lata alt partístrið fara og styðja Ólav á Heygum. Eg má hort siga, at um veljarar mínir høvdu givið mær eitt sovorðið brøv, hevði eg ikki betonkt meg uppá at framlagt tað, ikki sum eitt privat brøv, men sum eitt aktstykki.

R. Rasmussen: Eg skal bert siga nøkur fá orð um telefontelegrammið til hrr. Guttesen. Teir menn, ið finnast at tí, stóðu allan dagin ígjár og funnust at, at henda fyritøka skuldi handla nakað, ið stendur í skrivilsinum av 1910, men sum eg ongan dent leggi á. Hetta var teirra høvuðsargument igjár. Táið nú hrr. Guttesen kemur við einum úttalilsi frá keypmonnum í Vestmanna, siga teir, at hetta er óhóskandi, hetta er undirfundigheit. Eg kann ikki finna samanhang í støðu teirra. Um broytingaruppskotið frá hrr. A. Samuelsen vil eg siga, at tað er heilt óskyldugt og sakligt á at líta, men táið tað verður hildið saman við fleirtals- og minnitalsuppskotunum, verður tað eyðvitað, at tað er framsett bert fyri at køva sakina. Eg vil pástanda tað fyri utan at taka byrðuna av at bevísa tað. Tí í minnitalsuppskotinum er skotið upp at venda sær til ymsar kommunur Kvívík, Bø, Sørvág o. s. fr. Og í uppskotinum um ta sakina, sum kom frá Kvívík er skotið upp um at granska alla staðnis í Føroyum — ivaleyst í ta leið at annleggja fleiri kraftstatiónir í Føroyum. Nú áðrenn nakað er gjørt við hesar sakir skal staturin uppfordrast til at geva studning, áðrenn nakað er undirsøkt. Man kann væl bíða. Tað er væl ikki meiningin at staturin allareiða á hesi finantslóg skal bevilga nakað til kommunurnar. Broytingaruppskotið er stillað sum ein fella til at fáa menn at ganga saman um tað, so at heila sakin kann fella burt fyri tað fyrsta. Slíkt vil vera gott fyri teir menn, sum vilja at alt skal standa í stað. A. Samuelsen florerar av tí at Føroyar standa í stað. — Tað er nokk at vit fáa líkindi til at taka støðu til minnitalsins og fleirtalsins uppskot. — Aftur ídag er orðaskifti um Ó. á Heygum. Tað er utanfyri alt mál hvat A. Samuelsen kann loyva sær til her á tingi. Lat vera at vit okkara millum kunnu

siga mangt. Men um vit hava ein formann í tinginum, sum kanske ikki skilir føroyskt so væl, so eigir A. Samuelsen ikki at benytta sær av tí. Og tá hann ikki ger tað noyðast vit at rýma av tingi. A. Samuelsen vágar sær langt út, tá ikki ein hørð hond er á nakkanum á honum.

A. Samuelsen: R. Rasmussen hevur alla tíð á tingi, støðugt talað til tilhoyrararnar. Hann hevur sjáldan givið nakað bidrag til orðaskiftið ellars. Eg havi ikki funnið uppá at snakka við tilhoyrararnar. Zahle vendi sær sjálvur einaferð til tilhoyrarnar. Hann hevur byrjað hetta lagið. Eg skal vísa R. Rasmussen tað. Tá eg nevni Zahle, so fellur R. Rasmussen á knæ. R. Niclasen sigir at tað vóru ikki tilhoyrarnir, sum róptu fý til mín, men at tað var hann. Tað er ein munur. Men eg eri keddur at ein so nationalur maður sum hann rópar fý. Tað er skeivt føroyskt mál. Tað eitur: tví. Tá hann ikki dugir so fratt føroyskt, so er tað ikki vert at hann talar uppi í. Til Gutteson skal eg siga at tað hann kom framm við, visti eg framman undan, og eg visti at teir menn vóru sterkt interesseraðir. Man hevur viljað givið bevís fyri at teir í Vestmanna vilja hava elektricitetsverk, hvør sum kann skaffa tað. — So er sagt at eingi tøl standa í okkara broytingaruppskoti. Eg gangi út frá at R. Rasmussen vil stemma fyri fleirtalsins uppskoti. Hvussu nógvan pening dreyar tað seg um har? Er tað 30 000, 50 000, ella 1 ella 2 mill. kr.? Latum okkum fáa tað at vita. Teir siga sjálvir at uppskot sum ikki ganga út úppa tøl, kann mann ikki styðja. Kann mann ikki geva beskeð um hetta, so er teirra uppskot líka so svevandi sum okkara. Vit vilja hava at allar kommunur í Føroyum kunnu fáa tilskot og ikki bara ein partur av Føroyum. Tað er beklagiligt, men eg væntí ikki at mítt uppskot gongur ígjøgnum. Eftir hvat eg kenni til núverandi sjálvstýrismenn, so fáa vit ikki nakrar av teimum við. Í eygablikkinum eru teir væl samanarboiddir. Tað er nokk innført í teirra protokol, hvussu teir skulu stemma í hesum viðurskifti. Konny talar um brúk av privatum brøvum og sigir, at eg í fólkatinginum havi flagrað við einum privatbrævi. Patursson segði tað eisini. Men hann var í Føroyum, tá tað gekk fyri. Eg havi ikki flagrað við privatum brævi, men eg havi eitt yvirsetilsi av einum bemerkningi í einum privatbrævi, antin so odnar ella kølnar. Er hann kaldur, so odnar hann aftur. Eg vil standa til svars fyri hvat eg havi gjort har. Brævið var ikki til mín. Debess segði at honum dámdi ikki at Effersøe var farin út. Hann skal ikki smæðast at siga um Effersøe hvat hann vil; Effersøe hevur partífelagar her, sum vilja forsvara hann. Og tað er okkum lætt. Eg vil ikki koma inn á tað sum Debess segði. Vit vildu bara siga, at hetta var eitt selskap, sum skuldi slá hinar niður. Men tað lukkast teimum ikki. Tað er ikki einans Vestmanna, teir skulu slá niður fyri fót. So er talan um, at mann í Vestmanna hevur skrivað brev til M. Samuelsen um at styðja hetta og síggja burt frá partístríði. Nú kundi mann hava misfatað okkara støðu. Teir kundu hugsa at tá mann vil halda Ólav utanfyri, so kann tað vera, at mann í Vestmanna vil halda tað sama. Man kann tó ikki siga at tað er av partígrundum. Eg forsikri, at um mann hevði haft so nógv at gera við tær aftrur, sum eg havi haft at gjørt og vita hvat sum stóð úppa spæl, so vildi mann ónøguligt roynt at fáa statsstudning til Ólavs. Tað er ræðuligt at man skal pína meg til at siga hetta. Men tað var í 1910 ikki stuttligt at hava við tær privatu sakir at gera. Og hesum skulu vit síggja burt frá. Tað skilji eg ikki. Man kundi heldur forstanda at okkara støða í hesi sak ikki vildi skaffa okkum politiska styttu í Norðstreymoy. Men sjálvt um vit skulu politisk oyðiloggjast, so kunnu vit ikki standa ímóti hvat vit eru roynd ir. At aðrir menn, sum ikki hava tær somu roynd ir síggja annarleiðis uppa tað, kann eg ikki gera við. R. Rasmussen sigir, at uppskotið hjá mær er framuset fyri at køva sakini, men hann vil ikki taka byrðina at bevísa tað. Hann er ein fromm sál. Hevði hann framsett, at kommununar skuldu taka sakina í sína hond, so kundi tað vera. Hann sigir, at eg var so langt úti at formaðurin, um hann skilti tað, hevði talað at mær. Á sonn tíð sum R. Rasmussen er dydiga forharmaður yvir meg sigir hann, at heusigtin hjá mær er hin allarversta. Tað er móti øllum parlamentariskum reglum at tala so. R. Rasmussen hevur ongan rætt at trúgva, at vit ikki vilja gagna sakina eins væl sum hann. Eg trúgvi at Ólavur er ikki meiri interesseraður í hesi sak enn sum mangur annar. Eg veit at ymsir eru økonomisk interesseraðir og at summir tingmenn ikki tora at framnleggja øll tey verk, sum eru í sakina. Tað er ikki bara R. Niclasen. Eg væntí ikki at sjálvstýrismenn vilja stemma fyri broy-

tingaruppskotinum. Men lat teir stemma tað niður. Lat teir bara.

R. Rasmussen: Tað er merkiligt, at A. Samuelsen hera upptekur tað eina eftir Zahle. Hann plagar at upptaka ódygdir eftir monnum. At eg skal hava vent mær til áhoyrarnar — hann veit at tað er grov ósannheit. A. Samuelsen hevur hvørt ár roynt at niðurverduga Føroya løgting. Hann gongur út frá at Ólavur skal disponera í hesum selskapi. Tað er skeivt. Hann veit vel at tað er skeivt. Tað avhongur heilt av ministeriinum hvat støðu Ólavur skal hava í selskapinum. Vit hava ikki makt at siga at Ólavur skal vera í stýrilsinum fyri hesi sak. Skal hann vera uppi í sakini er tað vel tí at ministeriið meinar at tað er til frama fyri hana.

J. Guttesen: Fólkatingamaðurin talar um, at tað vóru høvuðshandlarnir í Vestmanna, hann vildi hoyra frá, men tríggir av hesum eru høvuðshandlar og tveir eru úthandlar.

M. Samuelsen: Hr. Paturson segði, at tað skuldi vera av partipolitiskum grundum, at eg ikki kann stemma fyri flertalsuppskotinum, tað er ikki beint, tað er eina og aleina av tí stillingi, sum Ólavur á Heygum úntekur í samfundinum sum ein stemplaður persónur, tað er bodrøviligt at skula taka tað uppá tunguna. Baggi mín, sýslumaðurin segði í áðni alt tað, ið eg vildi hava svarað, so mær nýtist ikki at taka tað uppaftur. Debess, skyldmaður okkara — hóast andsfrændi okkara er hann nú ikki — tosaði um aktstykkir og privatbrøv. Hvussu eg stilli meg til veljarar mínar verður mín sak, eg kann ikk ganga aðra enn ta beinu og røttu leið. Eg kann ikki taka eftir Debess í hesari sak, men eg haldi, at hevur nakar gjørt hesa sak partipolitiska, so eru tað sjálvstýrismenn.

S. P. úr Konoy: Um eg skilji bræðurnar Samuelsen beint, so meina teir at vilja fremja málinum á besta hátt, men tað ið teir finnast at, er at hrr. Ólavur á Heygum hevur borið sakina fram á tingborðið. Eg havi einki haft við tann mann at gera, utan eg havi hitt hann av og á, men og haldi meg skilja, at maðurin er eitt hevur hægri enn fólk flest; hann hevur altíð baxað við stórum hugsanum, altíð starvast við okkurt og hvørja ferð nakað er komið í verk í Føroyum, so hevur navn hans verið uppi í. Eg vil bert nevna telefon, banka og nú elektricitetsmálið. Eg haldi tað vera skeivt av bræðrunum úr Norðstreymoy at geva seg út fyri martýrar fyri hesum náli. Eg siggi heilt neutralt uppá hetta mál og meini eg, at tað verður framt í Føroyum fyrr ella seinni, og eydnast tað at kova tað nú, vil tað kortini koma aftur og so er tíð burturspilt. Eg vil aftur nú framhalda, at tað, ið hrr. Effersøe ígjár tillát sær yvirfyri hrr. Gunleson var á markinum fyri tí loyviliga.

A. Samuelsen: Eg tók burtur úr brævinum nakað, ið var diskuterað offentliga, og mun nýttist hvorki at taka brævið ella lana alla stjala brævið. Eg havi verið úti fyri, at ein ministari í fólkatinginum hevur refererað eina privata samtalu við meg aldeilis skeivt, so eisini her hava vit ministara fyridømi.

D. J. Thomsen: Táið okkum nú líður móti endanum av hesum tjaki, so vil eg siga, at eg ætli mær at geva flertalsuppskotinum atkvøðu mína, tí eg siggi, at henda fyritaka er ein stór og góð fyritoka, ið vil bróta slóð fyri slíkum øðrum, og serliga tí her eru góðir oddamenn frá Keypmannahavn, ið ikki vilja landi okkara nakað ilt.

A. Samuelsen: Eg eri glaður við at hoyra hetta, at teir donsku oddamennirnir í Keypmannahavn skulu taka ansvarið fyri at hrr. Ólavur á Heygum komur við í hesa fyritøku. Annars vildi eg fegin vita, hvat fyritøkan ialt vil kosta.

M. Samuelsen: Hrr. S. P. úr Konoy sigir, at tað er bert tí, at Ólavur á Heygum hevur borið hesa sak fram á ting, at vit ikki vilja fremja hana, nei, tað er tí, at vit vita, at hann vil oyðileggja hana.

J. Paturson: Tingmaðurin úr Fuglafirði spurdi hvat hetta vildi kosta; eg skal royna at svara heilt stutt. Verkið í Vágum er roknað til o. u. 600 000 kr., verkið í Vestmanna o. u. 900 000 kr.; tá er leiðingar til tey ymsu plássini ikki uppí roknað; í alt verður tað o. u. 2 mill. krónur. Henda pening hevur felagið fingið lyfti um at fáa frá einum banka í Keypmannahavn, um staturin ayder den nødvendige Støtte, under den Form, som Staten maatte anse formaalstjenligst. Um hrr. A. Samuelsen hevði kannað vel eftir í nevndarálitinum hevði hann kent hesi tøl.

A. Samuelsen: Hesi tøl havi eg sæð, og ymsir tingmenn plaga at vita, at eg

plagi at seta meg líka nógv inn í sakirnar sum hrr J. Patursson. Eg vildi vita, hvussu nógv staturin skal lata til fyritøkuna.

R. Rasmussen: Vit hava ikki loyvi at ivast um hasi tølini. Hrr. A. Samuelsen vil hava, at vit skulu siga her á løgtingi, hvat staturin skal geva hertil; tað kunnu vit sjálvandi ikki. Men tað er tann munur á uppskotunum, at uppskot fleirtalsins nevnir ein avísan pening, sum staturin skal taka ein part av, meðan uppskot minnitalsins ongan ávísan pening nevnir.

H. O. W.-Tórgarð: Eg dugi ikki at fáa burtur úr nevndarálitinum, hvat ið staturin skal gera, eg haldi okkara broytingaruppskot er líka gott, og vil eg mæla til at geva tí atkvøðu. Hrr. R. Rasmussen hevðist so harðliga at tí manni, ið hevur framsett broytingaruppskotið; tað eru kortini 4 menn, ið hava borið tað fram og eg vil ikki taka við tí, at eg skal ætla at køva hesa sak. Eg dugi ikki at fata, at hetta broytingaruppskot skal vera so ørt. Tað var víst ígjár, at næstan ongar granskingar vóru gjørdar, og eg vil mæla til, at vit gera nýggjar og umfatandi granskingar fyri at fremja arbeiðið fyri kommununrnar.

A. Samuelsen: Hrr. R. Rasmussen kann ikki koma undan tí, at tað ikki framgongur av nevndarálitinum, hvussu nógv staturin skal lata og hvat ið fæst fyri tað. Um staturin gevur okkum 2 milliónir at ráða yvir, so var tað nógmikið til hita og ljós til allar Føroyar, men nú verða tað bert tvey pláss í Føroyum, ið koma at njóta gott av hesum peningi. Um nú staturin letur 1½ million — eg sigi ikki, at hann letur tað, men um hann ger tað — vilja allar hinar kommununrnar koma og krevja tilsvarandi tilskot; og táið staturin gevur hesum báðum kommunum studning, mugu hinar eisini fáa.

J. Patursson: Kvívík bað um at vit skulu granska, hvat kraft er í áum, vøtnum og streymi har, og vit hava tikið væl við hesum uppskoti. Men nú kemur hetta broytingaruppskotið, ið biður um gransking av magninum í fossum, áum og vøtnum, men her er streymmagnið gingið burtur úr. Hetta er bert eitt av tí, eg havi at finnast at í uppskotinum.

A. Samuelsen: Eg vil her siga, at tað er keðiligt, at streymarnir eru farnir burtur úr, men tað man vera lætt at fáa teir uppí aftur; eg skal í hvussu er stemma fyri einum broytingaruppskoti herum, um hrr. J. Patursson vil bera tað fram.

Uppskot fleirtalsins var samtykt við 11 atkvøðum.

Bønarbrøv frá Kvívík.

3. viðgerð.

O. Effersøe: Jeg skal anbefale Mindretalsforslaget. Man er i Udvalget kommet til nogenlunde Enighed. Dog er der den Forskel, at det i mit Punkt hedder, at Tinget skal henvende sig til Ministeriet for offentlige Arbejder. Vi er enige om, at Staten betaler en vis Del af Udgifterne, nemlig Halvdelen. Hvad angaar Valget af Ministerium plejer man, naar det gælder tekniske Sager, at henvende sig til Justitsministeriet. Med disse Ord vil jeg anbefale Mindretalsforslaget.

J. Patursson: Tað er ikki annar munur millum uppskotini enn at vit eftir gomlum siði hava vent okkum til justitsministeriið.

M. Samuelsen: Eg vildi at avstenningin varð útsett eina løtu, tá ikki allir tingmenninir eru komnir.

Formaðurin: Afstemningen vil da blive udsat.

Sjómarklið.

3. viðgerð.

S. P. úr Koroy: Tað var greitt frá igjár hvat nevndin hevur borið fram í hesum máli, og tingið var heilt samsint. Vóni at vit eisini nú, tá stemmast skal, ganga saman. Í hesi sak kann tað vera av stórum týdningi.

M. Samuelsen: Mær týkir eisini at

vit mugu vera samsintir her. Tað er tí keðiligt at tað eru so nógvir menn burtur. Men tað er væl sinki at gera við.

Formaðurin: Der vil blive stemt ved Navneopraab.;

Sakin varð einmælt samtykt.

Telegram til Ísland.

Uppskot til avgerðar.

O. Effersøe: Som det fremgaar af det forliggende Forslag har jeg tiltraadt det og stemmer med Glæde derfor. Jeg anfører kun dette for en anden Gangs Skyld. Jeg skulde ønske at Sagen var fremkommen paa den Maade, at man fra den Side, hvor Sagen rejstes, havde henvendt sig fra dette Partis Formand til det andet Partis Formand med Spørgsmaalet, og at man besluttede et Udvalg, som kunde redigere Ordlyden. Men dette vil jeg ikke lade være bestemmende med Hensyn til min Stilling til hele Sagen. Hvis jeg havde haft noget med Affattelsen at gøre, saa havde jeg dog bedt om, at Sproget forstodes lidt bedre saaledes, at det blev affattet i et Sprog, som falder noget mere sammen med det, som jeg kender.

Sakin varð einmælt samtykt.

Val av nevnd viðv. landstingsnevndini.

3. viðgerð.

Edw. Mortensen: Nevndin hevur haft til umhugsan uppskot frá J. H. Poulsen og fleiri um at velja eina millumtinganevnd viðvíkjandi landstingskommissiónini. Fleirtalið í nevndini heldur at tingið skal seta eina slíka nevnd nú, tá kommissiónin hevur upptikið vitnisburð og hevur fingið langar vitnisforklæringar, sum eisini anganga føroyska politikk. Eg skal mæla til at samtykkja uppskotið frá fleirtalinum.

H. C. W.-Tórgarð: Á minnitalsins vegna skal eg siga, at vit ikki ynskja at fyritaka nakað, men halda okkum til ta støðu, sum minnitalið hevur tikið í hesi sak.

M. Samuelsen: Eg haldi meg til alt tað, sum vit hava tikið støðu til í hesi sak. Eg fyri mín part taki fullstenduga avstand frá fleirtalsins uppskoti, og eg vildi ikki givið møti um og bleiv valdur inn í ta tilætlaðu millumtinganevnd.

Fleirtalsuppskotið varð samtykt.

Studningur til arbeiðisleysar fiskimenn.

2. viðgerð.

R. Rasmussen: Nevndin hevur vent sær til amtið um upplýsing um, hvussu er gingið við studning til fiskarar í Danmørk, men vit hava ikki fingið so greiniligar upplýsingar, sum vit ynsktu. Tí hevur nevndin gjørt av, at biðja justitsministeriið fáa hesar báðar lógir gjørdar nýtandi í Føroyum, eins væl og tær hava verið í Danmørk. Haraftrat hevur nevndin samtykt at biðja tingið seta eina millumtingsnevnd til at koma á samt um, hvussu hetta greiniligari skal skipast. Allir tingmenn eru óivað samsintir í hesum og eg vil tí mæla til at geva nevndaruppskotinum atkvøðu.

J. M. Matras: Eg kann slutta meg til orðfararnar. Vit hava verið leingi um at fáa hetta málið fram og eg skal mæla tinginum til at geva okkara uppskoti atkvøðu.

Joen Poulsen: Eg hugsi, at allir koma at stemma fyri hesum. Sakin viðkemur okkum øllum Føroyingum; men tað kundi verið, at ikki allir vóru klárir yvir, hvat ið lógin í detaljum gongur út uppá, so eg vildi fegin haft nakran upplýsing herum.

S. P. ár Konoy: Vit biðja um, at tann lóg hvarsíðtir fiskarar í Danmørk hava fingið studning frá statinum eisini má virka í Føroyum eins og í Danmørk. Við tað, at vit ikki hava kunnað fingið upplýsingar um lógina í detaljum, ynskja vit setta eina millumtinganevnd.

R. Rasmussen: Eg dugi sjálvandi ikki lógina uttanat, men tað hevur staðið so nógv í bløðunum um hana, og hon hevur verið so nógv frammi, at eg trúði, hon var

almannakond. Hovuðsinnihaldið hennara er, at fiskarar, utan ávisa formúu og sum einki arbeiði kunnu fáa, frá stabinum kunnu fáa studning upp í 90 kr. um mánaðin. Heilda lóg var ansvond soleiðis í Danmork, at so gott sum allir fiskarar, ið hevdu undir ta ásetta inntoku, fingu henda studning, meðan foroyskir fiskarar ongan fingu. Kortini hava livikorini verið ringari her, grónvara nógv dýrari og inntøkurnar nógv minni. Hvat hin login um hjálp til lættilsi av prísum á produktionsmiðlum viðvíkir, so kunnu oftir lonni privatmenn fáa hjálp til útbúgving, og eftir hvat ið sagt var í ríkisdegnum, var eingin ivi í, at ið hvussu er tað salt, ið verður nýtt av fiskarunum sjálvum verður roknað hertil, meðan tað kanska kann ivast um tað salt, sum reiðararnir nýta, hóast tað ætlandi eigur at koma her innundir, soleiðis sum viðurskiftini eru reiðara og fiskara millum í Føroyum.

O. Effersøe: Jeg er enig i den Betragtning, at Loven bør anvendes paa Færoerne paa samme Maade som nede i Kongeriget, men saa maa det være selve Loven og altsaa Lovens Indhold, der gøres anvendelig, og det vilde derfor være mere heldigt, om vi havde selve Loven liggende for os, da der heroppe synes at herske stor Uvidenhed om Lovens Indhold. Saa vidt jeg kan mindes, drejer det sig ikke om almindelig Arbejdsloshed, men kun om Arbejdsloshed af en bestemt Aarsag, og jeg synes, at Ordføreren ikke nok har pointeret dette.

R. Rasmussen: Tað eru tvær lógir um studning til fiskarar; tað er tann fyrsta, ið vit her tala um. Í henni er ikki tikið nakað forbehold utan at inntokumissurin ikki skuldi skyldast sjúku. Í teirri lóg, ið kom aftaná, var tikið tað forbehold, at studningur kundi gevast bert til erhvervsfiskarar.

Joen Poulsen: Eg skal takka hr. Rasmus Rasmussen fyri hesar upplýsingar, ti eg havi livað í teirri trúgv, at hetta galt meun, ið vóru arbeiðisleysir vegna kríggið, og eg havi tí sagt við fólk, ið hava spurt meg, at teir kunuu jú søkja, men tað var ikki vist, um teir fingu nakað. Táið soverðið er, sum hrr. R. Rasmussen sigir, er tað nakað annað, og eg haldi, at vit allir kunnu stemma fyri hesum.

D. J. Thomsen: Eg dugi heldur ikki at siggja heilt klárt, hvat úrslitið verður úr hesum máli. Men eg vil siga, at skuldi atvoldin verið, at skomaini ikki vóru beint úlfylt, so er tað harmiligt. Eg kundi framhalda, at fiskarar í Suðuroy hava nærri rætt til studning enn aðrir, við tað at vandasjógvurin hevur ligið teimum so nær, at teir mugu hava mínst líka nógvan rætt til studning sum danskir fiskarar. Eg skal mæla til at samtykkja hesum uppskoti.

Samtykt varð at geva sakini viðmæli til stateins og seta eina millumtinganevnd við 3 limum.

Sanatoriilæknaembætið.

2. viðgerð.

Edv. Mortensen: Tað hevur sýnt seg ringt at fáa doktara til embætið sum sanatorii- og kommunudoktari í Havn. Nevndin hevur frá fysikus roynt at fáa upplýsingar, og av teimum frangongur, at ein lækni, ið er kommunu- og sanatoriilækni kann rokna við einari inntoku uppá 7000 kr. Fysikus sigir, at tað, ið ger tað trupult at fáa nakran lækna til hetta embætið, er at táið tað verðu uppsligið, verður lýst við at har garanterast ein løn uppá 4000 kr., og teir ið vilja søkja halda, at iontokan so heldur ikki verður meira. Fysikus mælir tí til, at garantiin verður sett upp, og væntar hann so fleiri at vilja søkja. Vit hava hugsað, at vit kundu sett garantiina upp í 6000 kr., sama løn sum til domis fútin hevir. Vit hava ikki haft stundir til at samráðast við Havnar býráð, men vit hava viljað givið sanatoriinevndini loyvi løgtingsins vegna at taka ein part av garantiini, um býráðið ikki vil taka alla. Heilda garanti vil óivað ikki koma til at vera til peningaútreiðslu fyri tingið, við tað at læknin utan iva vil tjena sínar 7000 kr. Fysikus meinar, at hitt almenna kanska eigur at gjalda ein part av flutningskostnaði læknans til Førova, tað er heilt rímiligt. Spurningin um hús til læknans hava vit ikki vilja lagt okkum uppí, men vit vita, at býráðið vil gera sítt besta fyri at fáa eini góð hús. Vit hava framsett soljóðandi uppskot:

»Sanatorieudvalget henstiller til, om det skulde være nødvendigt, paa Lagtingets

Vegna sammen med Tórshavns Byraad at garantere som Mindsteløn ved Embedet som Sanatorielæge og Kommunelæge i Tórshavn 6000 Kr. og eventuelt bevilge et Beløb som Rejsegodtgørelse til vedkommendes Rejse fra Danmark og her til Færøerne.

Uppskotið var samtykt við 15 atkvøðum.

Vernd av fiskayngli.

(Uppskot til avgerðar).

S. P. úr Konoy: Tað fyrilá andragandi frá reiðaríforeiningini um at verja fiskayngulin. Men sakin er einki upplýst. Tað hevur ikki verið gjørligt hjá nevndini at fáa positivar upplýsingar um hvat tað drejar seg um. Vit vita ikki um nakrar treytir ella um tað eksistera nakrar treytir viðvíkjandi fiskayngli. Fyri at kunna fremja málið, hevur nevndin biðið amtmannin skaffa upplýsingar, sum kunnu fáast, og so leggja tað fram fyri hitt vanliga tingið í summar.

J. Patursson: Havið kann væl ikki friðast fyri tí fiskayngli, sum er uppi í sjónum. Tað má væl vera sum rogn. Úr tað komið úr rognunum og er ferið at sveima, so kann væl einki gerast við tað. Tað má vera meint við tað, sum er á botninum.

A. Samuelsen: Vit hava haft hesa sak frammi í útvalginum í fleiri dagar, og eg helt at tað var meiningin at fremja hana nú. Teir kundu hava henvent sær til andragarnar, har, sum beskeð kundi fáast. Tað kann hugsast, at nm sakin útsetist, so kann tann beleiliga tíðin ganga frá. Fjøldin av nevndini heldur altso at sakin ikki hevur so stóra interessu.

S. P. úr Konoy: A. Samuelsen sigir, at vit ikki hava søkt upplýsingar. Hvar veit hann tað frá? Lat vera at byggja áðrenn grundasteinurin er lagdur.

A. Samuelsen: Skal eg skilja hesi orð á tann hátt at teir hava henvent seg til andragarnar?

S. P. úr Konoy: Hevur hann positivt sum kann bokrofta hansara úttalilsi?

A. Samuelsen: Tað er ikki skuldligt at orðaskiftast við orðforaran. Eg spurdi um teir hava søkt upplýsingar hjá andragarunum. Eg kann ikki fáa svar uppá tað. Tá hann ikki kann geva beskeð, so noyðast vit at fáa beskeð á annan háttr.

S. P. úr Konoy: Hvussu er við hesum manni? Minnist hann ikki til síni orð, tá nakrir minuttir liggja ímillum. Hann spyr ikki meg. Hann bara segði tað at vit ikki hava søkt upplýsingar. Eg segði at útvalgið hevði roynt at skaffa upplýsingar á rætta stað. Er hann ikki tilfriðs enn?

A. Samuelsen: Jú, nú eru eg tilfriðs og kann sláa fast at teir hava sokt beskeð frá reiðarafelagnum, og tað hevur sagt at tað einki beskeð kann geva.

Edv. Mortensen: Vit hava eisini sokt upplýsingar hjá umboðum, men kundu ongar fáa.

S. P. úr Konoy: Situr A. Samuelsen inni við kunnskapum á hesum umráði?

O. Effersøe: Jeg undres over, hvad her foregaar. Konoy er Medlem af Udvalget og skal give Oplysninger. Det lader til at Ordføreren kræver Oplysninger af Medlemmerne. Lad os ikke kives om dette. Hvem har Ordføreren talt med? Vi har ikke paa Forhaand haft Lejlighed til at sætte os ind i, hvad der foreligger for Udvalget. Lad os faa Besked fra Udvalgsordføreren.

S. P. úr Konoy: Tað er mátin hjá hesum monnum, at tá ein gongur seg fastan, so hjálpa hinir honum. Ein tingmaður kemur her og ikki spyr meg, men raisteinkir meg. Tá eg greiði frá nevndarálitinum, so havi eg einans at halda meg til, hvat ið stendur í tí, og hvat vit hava tyri.

O. Effersøe: Paa det Sted, hvor Konoy virker, der bestemmer han. Men endnu bestemmer han ikke her i Salen. Jeg har Lov at spørge. Og der var Grund til at spørge. Det er ikke rigtig at kives om dette. Men lad os faa Oplysninger.

S. P. úr Konoy: Um tingmaðurin hevði verið staddur inni, so hevði hann hoyrt, hvat frágreitt er. Eg skal væl ikki draga hann inn her í tingsalin.

O. Effersøe: Jeg vil ikke fortsætte Mundhuggeriet her.

S. P. úr Konoy: Eg heldur ikki, men eg eri altíð tilreiðar at upptaka orðaskifti.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Avstemning um sakina: Bønarbræv frá Kvívík.

O. Effersøe: Jeg vil henstille til Formanden, om det ikke er rigtigt, at der ikke skal stemmes ved Navneopraab om Sagen i dens Helhed. Jeg vil nemlig være tilbøjelig til at stemme for Sagen i sin Helhed.

A. Samuelsen: Tað er spursmál um man ikki eisini skal stemma um minitalsins punkt 5.

O. Effersøe: Jeg vil støtte, at der stemmes om dette. Jeg antager, at man fra Flertallets Side ikke har noget imod det. Det er jo ikke modsat Flertallets Forslag.

J. Patursson: Punkt 5 er ein óneyðugur setningur, sum her er settur framm. At vit lata granska vatnkraftina í Føroyum, so setur man seg tó ikki móti nakrari aðrari fyritøku. Vit biðja at man fer granska hesar streymar og vøtn fyri at tað skal vera so lætt sum gjørligt hjá øðrum at fáa slíkar fyritøkur á gongd.

A. Samuelsen: Hetta er ikki líkagyldugt. Um tað eru kommunur, sum longu hava fingið undirsøkilsi í gongd, so kann ministeriið siga, at vit vilja ikki styðja tykkum, fyrr enn tað almindiliga undirsøkilsi er yvirstaðið. Tað vil altso tálma sakini. Tí meini eg at fleirtalið kann stemma við okkum.

S. P. úr Konoy: Eg haldi at hetta punktið er líkagyldugt. Tað ger tað sama um man stemmar fyri tí. Tað nýtist ikki. Ikki fyri tað: Eg kann væl stemma fyri tí. Tað liggur væl ikki hor í, at ongar kommunur skulu røra seg, fyrr enn alt er undirsøkt.

R. Rasmussen: Eg eri eins á máli um hetta sum síðsti ræðarin. Eg kann annars ikki forstanda motivini til hetta. Høvdu teir greitt frá teimum, so var tað væl lættari at fata.

O. Effersøe: Motiverne forekommer mig ganske tydelige. Naar der nu fra Tinget kommer Henvendelse til Regeringen om Iværksættelse af Undersøgelse af disse Spørgsmaal, og naar der saa kommer Andragende fra en eller anden Kommune, saa vil Ministeriet kanske sige, at det lægger vi bare til Side, indtil Undersøgelsen har fundet Sted.

A. Samuelsen: Det er tilstrækkelig Motivering af Punktet, saaledes som Effersøe har udtalt. Um ministeriið sigir, at man skal bíða, so vil Havnar kommuna ikki kunna koma nakran veg og ikki fáa nakran studning frá statinum. At vit skulu pressa Havnina til at taka ljós frá A/S Føroya handil, tað kann tað ikki vera talan um.

R. Rasmussen: Teir tveir síðstu talarnir hava ikki víst serligt álit til ministeriið. Eg antaki at um kommunan spyr um studning til verkið, so sigir væl ministarin: jú lat okkum straks taka fatur á at undirsøkja hjá henni.

O. Effersøe: Forstanderskabet i Frodebø har ladet undersøge om Havneanlæg. Saa fremkommer man med Andragende til Tinget, om Tinget vilde søge til Regeringen. Det vilde man nok. Men man skal undersøge andre Anlæg først.

R. Rasmussen: Vit hava onga lóg her enn um brák av vatni. Einhvør eigari kann bonytta sína á, sum hann vil. — A. Samuelsen setur hetta í forbindilsi við anlegg frá selskapinum á Føroya handil og industrie. Ja, so fái eg bøteinkiligheitir um tað.

A. Samuelsen: Eg segði tað kundi hugsast, at Havnar kommuna vildi ganga til statsmyndigheitirnar um at fáa lán til elektricitetsverk. Og tá hon so ikki kundi fáa studning, so mátti hon taka til okkurt annað.

Eg haldi tað vera skeivt at løgtingið skal forða fyri, at tær føroysku kommunur skulu fáa studning frá statinum eftir teim principppum, sum vit í dag hava samtykt, at privatar fyritøkur skulu fáa.

J. Patursson: Um Havnar kommuna kann framskaffa eitt fullfíggjað uppskot til elektricitetsverk og hevur fingið sær

ánararætt til vatnstøðuna, og hon so kemur til statsins og biður um studning, so man hon eisini fáa hann. Men eg vænti kortini, at tað vil vara leingi, áðrenn Havnar kommuna kann vísa á slíkt arbeiði.

O. Effersøe: Jeg synes, det er mærkværdigt, at d'Hrr. ikke vil stemme for et Forslag, som i hvert Fald ikke vil gøre Skade, men som efter min Mening er et af de mest oplagte.

A. Samuelsen: Eg helt eisini at henda sak var so uppløgd, at allir menn her vildu stemma fyri hesum. Tingmaðurin úr Kirkjubø sagði, at eingin kundi hava nakað imóti tí, um Havnar kommuna skuldi fáa nakað í lag. Nei, tað er eisini sjálvandi.

J. Patursson: Skjótt er ófødddum at husa. Hetta er alt ófott. Havnar kommuna hevur einki onn, men eg sigi fyri mog, hevði hon fingið nakað í lag, sum teir kundu vist á, so vildu vit allir tingmenn styðja sakina til statin.

A. Samuelsen: Vit vita líka nógv um verkið hjá Havnar kommunu sum um hitt, ið er samtykt í dag, eg kann ikki trúgva, at fleirtalið vil ganga imóti at styðja eina slíka sak í sínari almindiligheit.

Formaðurin: Der vil blive stemt om Mindretalsforslagets Punkt 5.

Tað varð samtykt við 13 atkvøðum.

Uppskotið í síni heild varð samtykt við 20 atkvøðum.

Ólavsøkutingsetan 1919.

Fundur mánadag 4. august.

Viðtøka um øðuveiðu.

1. viðgerð.

J. Guttesen: Hetta er bonarbrav frá Eiði og Haldarsvík og gongur út uppá at fáa sakina endurnýggjaða. Ég skjóti uppá, at sakin fer í kommunalu nevndina.

M. Samuelsen: Henda viðtøkan hevur goldið í 5 ár og nú er biðið um, at hon skal galda eitt tílíkt áramál aftrat. Viðtøkan var gjørd fyri at forða, at øðurnar skuldu oyðast, og at tess vegna millum annað reiðskapini skuldu vera einsartað fyri allar. Viðtøkan hevur virkað væl, og øðurnar hava staðið seg so væl, at menn hava fingið so frætt, sum teir hava brúkt til agns. Forstandarskapið biður tí tingið anbeðalla ministeriiuum at endurnýggja hesa viðtøku, og tað vóni eg, at eingin her vil seta fót fyri. Guttesen vísti sakina til hina kommunalu nevndina. Eg vil vísa haua í nevndina fyri fiskarílógini, tí hetta er jú á ein hátt ein viðtøka fyri fiskiskap.

Sakin varð beind í hina kommunalu nevndina.

Rannsókn av seyðasjúku.

1. viðgerð.

Nyholm Debess: Hetta er skrivilsi frá djóralæknanum, um tingið vil geva nakrað til eina roynd, sum er gjørd til at stelga eini bestemtari seyðasjúku. Viðkomandi bóndi hevur havt nakrar útreiðslur av hesum royndum, til medicin o. s. fr. Ég vil vísa hesa sak til líggjarnevndina.

Lønhækkan til djóralæknans.

1. viðgerð.

Nyholm Debess: Hetta er eisini ein sak frá djóralæknanum, sum í hesum skrivilsi heldur, at lønin hansara er ov lág. Tað sæst av hesum sama skrivilsi, hvussu týdningarmikið tað er fyri Føroyar at hava djóralækna. Henda sak hevur sín týdning, og vil eg biðja tingið taka væl undir her. Eg vil vísa hesa sak í nevndina, sum hevur við landbólógirnar og landbrúksskúlan at gera.

Motorbátur til djóralæknans.

1. viðgerð.

Nyholm Debess: Hetta er eisini sak frá sama manni og eg vil vísa hana í somu nevnd, sum sísta sak.

O. Effersoe: Der var en Ting, som jeg vilde spørge Formanden om. Er der ansat Dyrlæge?

Formaðurin: Der har kun været en Ansøger til Embedet, og det maa ansees, at denne er ansat. Jeg gaar ud fra, at Udnævnelsen kommer herbil med næste Post. At dette Andragende er fremlagt allerede nu, er fordi jeg mener det heldigt, at dette Spørgsmaal ikke kommer til at vente til senere hen i Tingsamlingen

Rannsókn av vatnkraft.

1. viðgerð.

J. Patursson: Eg skal mæla til, at sakin fer í 5 mannanevnd. Sum kunnugt situr millumtinganevnd, sum skal framleggja frágreiðing um sítt arbeiði viðvíkjandi vatnkraftini í Føroyum og koma framan við uppskoti har um. Hetta starv er so vítt líðugt, men er ikki frammlagt, tí vit ætla at samráðast við teir verkfrøðingar, sum eru her uppi, og tað kann vera gjørt mitt í hesi vikuni, og tá vil frágreiðing koma frá nevndini. Eg vil so mæla til at henda søk fer í eina 5 mannanevnd.

H. C. W.-Tórgarð: Eg hevði hugsað mær, at eisini onnur andragandir av sama slag vóru sett á dagsordanin saman við hesum, so kundi man hava talað nakað um tey arbeiðir, sum eru í gongd elektriskari kraft viðvíkjandi. Eg skilji ikki, hví hetta andragandi skal behandlast sum serskild sak, og haldi tað vera best at millumtinganevndin tekur sær av hesum. Annars bað eg um orðið viðvíkjandi tí, ið Patursson segði um, at frágreiðingin frá millumtinganevndini vil koma framm í hesi viku. Eg eri limur í hesi nevnd, men kenni eiuki til hesa frágreiðing. Persónliga dámar mær ikki tað, sum gjørt er viðvíkjandi granskingi av elektriskari kraft. Tó vit enn ongan løgtingsberatning eiga, kann eg tó minna á, at sakin av fyrstan tíð var reist av Kvívík søknar kommunu. Minnitalið helt fram í vetur, at tað var ein forútseting, at vit við hesum rannsóknum ikki skulu ferða kommunnunum í at gera rannsóknir. Kortini má eg siga, at hesar rannsóknir oru gott uppá veg til at ferða kommunnunum. Havnar kommuna hevir fyri egna rokning gjørt rannsóknir, men nú vísir tað seg, at tann maður, ið er leiðari av teimi almennu rannsóknunum, uppá uppfordring av einum blaði, hevir gjørt reiði fyri, hvat hann heldur, at Havnar kommuna eigir at gera, og er tað í stríð við tað, sum kommuntan ætlar at gera; hann mælir nevniliga til at kommunan skal taka elektricitet frá anleggjunum í Vestmanna. Fólk fær ta hugsan, at henda reiðingjorslan heldur er ein anbefalling av anleggjunum í Vestmanna, og eg vil mæla ímóti, at tann maður, ið er engageraður av løgtinginum, arbeiðir ímóti einum manni, ið er engageraður av einari kommunu.

J. Patursson: Eg vil seinni halda eina langa talu um, hvat nevndin hevir gjørt, og tað vil eg gera, táið nevndarálitið fyriliggur. Í dag ber ikki til at ganga av greiniliga inn á hetta mál, tað er so stórt, at eitt má hugsa væl um, hvat eitt ætlar at siga.

O. Effersoe: Det gleder mig, at Hr. Patursson vil give en saadan Redegørelse, men det gælder om at faa den saa hurtigt som muligt. Jeg vilde gerne sige noget mere om denne Sag, men det kan ikke lade sig gøre, saa længe der ikke foreligger nogen Betænkning fra Udvalget. Vi har Krav paa at faa denne Redegørelse meget snart, og det forekommer mig at være utilstedeligt, at den ikke forelaa ved Tingets Sammentræden.

J. Patursson: Hr. Effersoe er altáur eftir at frætta frá nevndararbeiðinum, tað var gott, um hann hevði verið altáur eftir øðrum eisini. Hr. Effersøe hevir nú arbeitt fyri høvnum í, lat okkum siga, 12 ár, enn er ikki ein steinur lagdur. Hann hevir arbeitt fyri vegir í eins langa tíð, einki er gjørt enn. Vit hava arbeitt við hesum máli í 3 ella kanska 4 mánaðir, og er tað umráðandi, at vit ganga grunduga fram. Norðmenn hava arbeitt við hesum máli í 20—30 ár og eru nú fyrst komnir til fult greiði á, hvat teir ætla at gera.

Íslendingar hava arbeitt við hesum í mong ár, og eisini vit moga arboiða eina góða tíð, og fáa arbeiðið val fyrireikað, áðrenn vit blaka tað inn á ting. Um vit nú koma við nevndarálitinum um 7.—8. august, haldi eg tað ikki vera so ógviliga seint.

O. Effersøe: Jeg fremsatte Krav til Hr. Patursson om at faa at vide, hvad han og Udvalgsmedlemmerne havde foretaget sig imellem Tingsamlingerne. Det har vi Krav paa at faa at vide. Jeg forlangte ikke at høre, hvad forskellige Ingeniører mener om de forskellige Muligheder. Hr. Patursson syntes med Glæde at konstatere, at der ikke var anlagt Havne og Veje endnu her oppe. Det er beklageligt, at disse Anlæg endnu ikke er gennemført, men Hr. Patursson ved, at jeg i min Tid har arbejdet for disse Anlæg, saaledes at der er skabt Betingelser for at de kan gennemføres, det kan man ikke komme uden om; hvorfor de ikke er kommet til Udførelse, skyldes Aarsager, som vi ikke har været Herre over. Jeg har med Hensyn til de Sager udført, hvad der paahvilede mig, men Udvalget har ikke opfyldt sin Pligt. Følgelig passer Hr. Paturssons Sammenligning ikke. Det er dog for galt, at man faar den Slags serveret her i Lagtinget, som Hr. Patursson har fremført, her sidder dog fornuftige Mennesker og hører paa.

A. Samuelsen: Her er komið til tingið eitt bønarbræv fra forstandarskepinum í Fuglafirði, um at hjálpa teimum til eina rannsókn av møguligheitinum fyri at fáa elektricitet. Táið vit frættu um, at tað vóru komnir herupp nakrir menn at granska hetta elektricitetsspursmálið, og at teir ikki skuldu vera engageraðir privat, trúðu vit, at teir kundu koma til okkara eisini. Síðani hevir tað ikki verið møguligt at fáa nakað bestemt at vita um hesar menn, hvønn teir arbeiða fyri, hvat teir gera, sjálv nevndin tykist ikki at vita, hvussu mangir teir eru; eingin veit rættuliga, hvar teir eru mest, summi siga, at teir mest eru norðuri í Vestmanna. Vit kunnu ikki skilja, hví hesir menn skulu vera mest har, hvar allar rannsóknir longu skuldu verið gjørdar, og ikki har hvar eitki enn er gjørt. Eg haldi tað vera aldeilis nødvendigt, at útvalgið ið hevir antikið hesar menn sigir okkum frá, til hvat teir eru antiknir, utan so er, at tað er eitt privat selskap, ið hevir antikið teir. Eg havi hoyrt, at táið teir koma til eitt pláss og verða spurdir um møguligheitirnar har fyri at fáa eloktricitet, so mæla teir fólki til at fáa sær hana úr Vestmanna. Teir tykjast at ferðast sum agitatorar fyri einum bestemtum anleggi. Eg vil spyrja um, hesir menn, sum nú sigast at vera engageraðir fyri offentliga rokning, eru teir somu sum frammanundan eru engageraðir til eitt privat selskap. Eg haldi ikki, at hetta er hóskandi, og at vit kunnu ikki hava gott álit á tær rannsóknir, hesir menn gera, táið teir ferðast um landið og agitera fyri einum privatum selskapi. Eg vil gjarna vita, hvør ið skal betala hesum monnum, Føroya Handil og Industri ella tingmaðurin í Kirkjubø ella løgtingið. Føroyafólk má krevja at fáa tað at vita, vit kunnu ikki bíða so leingi, sum fossanevndin sat í Noregi. Vit moga fáa at vita, hvat hesir menn eru engageraðir til, og hvør ið skal betala teimum. Hr. Patursson segði, at hann mátti hugsa seg um; her er einki at hugsa seg um, hann skal bert siga okkum alt tað, hann hevir gjort í nevndini, síðani tingið seinast var saman, og ikki hugsa ov nógv um langar forklæringar, hann skal bert siga frá og ikki yrkja og broyta.

M. Samuelsen: Eg vil spyrja: er hetta tað almenna undirsøkilsi, sum løgtingið samtykti í fjør, og skal hvør kommuna søkja um at fáa deil í hesum undirsøkilsum?

A. Samuelsen: Tað letur ikki til, at eg fái svar uppá mín spurning, so má eg ganga út frá, at hesir menn eru engageraðir privat, og so vita Føroyingar tað.

Formaðurin: Der er fremsat Forslag om at henvise Sagen til et Udvalg paa 5 Medlemmer; om ingen har noget at indvende, betragtes dette som vedtaget.

Hetta verð samtykt.

Fundur tísdag 5. august.

Hækkan av studningi til kommunulæknar.

1. viðgerð.

Formaðurin ansaa som givet, at disse Embeder vilde beholde deres Tilskud.

M. A. Winther: Doktarasakir hava hvørt ár ligið á tinghorði, og vit blívn við at behandla doktarasakir oisini í Vági og Fuglafirði, og tað betrakti og sum givið, at vit behandla doktarasakina í Miðvági. Fyriliggur nú hækkan av lønini til doktara á Eiði og Sandi. Tað hevur gingið heldur illa, og tað hevur hjóðað: atvoldin er, at vit geva ov lítið. Gevið meira, so fáa tit læknar. Vit hava roynt at geva tað vit kunna, men vit standa við ongum. Vit kunnu vera nokulunda einigir í, at Sandoy tørvar nógv doktara. Tí har er ringt at flyta læknan til og frá; eingir motorbátar, ongar havnir, og ofta er veðrið ringt. Tá so, og tað er ofta, telefonsambandið er stokt av, eru vit illa staddir.

Sakin er reist av sunheitsstýrinum, tað spyr, um løgtingið vil verða við til at hækka lønina. Vit hava ongan læknа nú. Nú kommissiónin hevur verið kunnu vit væl hava vón um, at tilskot fæst og at staturin vil hækka tað. Tað eru nakrir spurningar í hesi sak, soleiðis hvussu bevillingsmyndigheitirnar vilja stilla seg.

Eg fyrislái at sakin verður vist til eina 5-mannanevnd.

Joen Poulsen: Det har vist sig at være vanskeligt at faa Lægeembederne besat her, og jeg maa anbefale, at der ydes mere til Lægen end før, og her maa Lagtinget træde hjælpende til ved at yde større Tilskud. Jeg kan ikke tænke mig andet, end at Forstanderskaberne vil give den nødvendige Garanti for Lægernes Løn. Det er muligt, at Beboerne paa Sandø er meget daarligt stillet, f. Eks. paa Grund af Uvejr, men Beboerne paa den største Del af Østerøen og den nordvestlige Del af Strømø er meget uheldig stillet med Hensyn til Lægehjælp. Jeg vil tillade mig at anbefale et forhøjet Tilskud, og kan tiltræde Nedsættelsen af et særligt Lægeudvalg, og er deri enig med den sidste ærede Taler. Jeg vil tiltræde Hr. Winthers Forslag om et 5 Mands Udvalg.

R. Nielasen: Amtmannsins úttalilsir geva mær anledning til at spyrja, um vit kunnu hava vónir um eitt størri, eitt hækkað tilskot til læknans. Men eg má her spyrja, hvussu er tað við Vágum? eru Vágar dottnar burtur úr?.

Formaðurin: Der er i denne Forbindelse ikke Tale om Vaagøen. Som Sagen nu staar, er det Ejde og Sandø, Vaagøen maa kunne bestrides af Lægen i Vestmanhavn for det første.

M. Samuelsen var ikko í iving um, at kommununrnar vildu strekkja seg so langt, sum møguligt. Hann kundi svara fyri tí kommununi, hann repr., hon vildi ganga so langt, sum tað var møguligt.

R. Nielasen: Eg takki formanninum fyri hansara upplýsingar. Tað forundrar mog, at Vágur eru gloymdar, men tað hevur gingið undarliga til við Vágum. Tó at løgtingið ferð eftir ferð hevur henstilla til bevillingsmyndigheitirnar at geva tilskot til lækna í Vágum, hevur tað verið sum at sletta vatn á gás. Eg kann ikki síggja, at lækni ikki tørvar líka nógv í Vágum sum á Eiði og Sandi, tað er til dømis líka langt hjá Mykjunes-monnum, sum hjá nøkrum øðrum at koma til læknan.

Eg stóð sum ein, ið var við til at fáa ílag eina góðan ordning við kommunulækn. í Føroyum, og eg kom í 1915 við forslag, sum var antakiligt, og eg haldi fast við, at eg sá rætt uppá sakina, tá forslagið gekk út uppá at stovna embætir í Vági, Fuglafirði og Vágum fyri utan tey, ið vóru. Tað undrar mog, at Vágar skulu blíva við at vera loysingarbarn. — Eg tvívli ikki uppá, at tilskot fæst til Vágs o. s. fr., men skal sakin fyri Vágar enda við ansk. av motorbáti, er tað undarligt. Hvat situr Føroya logting til, tá ikki blívur tikið hønsýn til tað; at einki kann gerast fyri Vágar, er mær reint óbegrípuligt, tað er eitt merkiligt forhald.

Fær Vág, Sand, Fuglafirði og Eiði statstilskot, og Vágar verða gloymdar, so er tað galið.

Tað er talað um, at læknin skal praktisera 8. hvønn dag í Vágum. Men hann, sum kennir viðurskiftini í Vágum, má siga, at slíkt er hen í veðrið. Hetta verða vit als ikki hjálptir við. Eg vóni at tingið ikki hevur tapt hesa sak úr oygum og ikki ynskir at tað skal farast verri við okkum enn við øðrum pørtum av landinum. Soleingi hesin spurningur ikki er avgjørdur, vil eg ikki stemma fyri hækkan av doktaralønum. Um ikki ríkiskassin vil geva okkum studning til at fáa ein læknа, so kanska løgtingið tó vildi hjálpa okkum. Men so kunnu hetta: Vit hava roynt at fáa doktara úr Danimørk, men har sýnist eingin at vera at fáa. Vit hava so hugsað um at fáa úr Íslandi. Men tað tykist sum íslendskir læknar ikki hava lov at praktisera í Føroyum, men betraktast sum kvaksalvarar.

Eg vil spyrja formannin, hvussu vorðið er við hesum, og um t. d. apotekið kundi síta fyri at lata teir fáa medicin.

J. Patursson: Eg hevði væntað, at formaðurin vildi útlula seg um spurningin frá R. Niclasen. Tað hevur já ikki lítið at týða fyri okkum at fáa at vita, hvussu statt er við hesum. Eg vil siga nokur orð um læknamálið sunnan úr Vági. Tað gongur altso ongan veg við at fáa tað framum, sum tingið ynskir í læknamálinum. Vit kunnu ikki fáa studning til lækna í Vágum. Og um atgongd til at fáa læknar úr Íslandi — uppá hetta hevur tingið ikki eingang fingið svar frá ministeriinum. Har móti hava vit fingið studning til tveir motorbátar. Tað tykist løgið at tá tingið hevur samtykt nakað í hesum máli, at tað so skal látast, sum um tingið einki hevur gjort. Av tí fysikus Herup hevur sagt tykist einki annað at framganga enn at hvørki hann ella danska læknafelagið ella sunnheitsstýrið leggur nakað í, hvat løgtingið gor. Soleiðis havi eg skilt hann. Tað er ikki lítil minkan fyri tingið at nakrir læknar seta sog til yvirting, omanfyri løgtingið — og vit látast ikki um vón. Eg mátti sum ríksdagsmaður vera bilsin, tá eg fekk at vita at studningur til tveir motorbátar var uppfordur á fíggjarlógina. Løgtingið hevur jú ikki biðið um teir, og vit eru heldur ikki eftirspurdir. Tað verður látið sum um einki løgting er til. Vit sita her og samtykja uppskot fyri landið — eingin leggur í tað. Her er nakað fyri tingið at hugsa um. Annaðhvørt er at geva tingið upp ella fáa eitt annað ting, sum er so stimbrað, at tað, sum tingið sigir, skal standa við makt. Tá so er statt, kann eg ikki gera við at eg eri komin inn á politikk í hesi sak, tí hetta lagið kann eg ikki samtykja hvørki sum ríksdagsmaður, enn minni sum løgtingsmaður. Tað er natúrligt, at læknarnir nú vilja hava hægri løn. Hetta er einki at siga til. Ríksdagurin biður okkum at veita hægri løn, men samtíðis nokta teir løgtinginum at fáa størri inntøkur. Eg vil biðja nevndina hava fyri eyga tað, ið hevur verið haft fyri fyrr í tinginum í hesum máli.

A. Samuelsen: Eg skal geva orðføraranum fyri sjálvstýrismonnunum rætt í at doktaraspurningurin er viktugur, og úr minum løgtingsdømi — sum summir kalla tað — vil eisini koma bønarbræv um at fáa doktara í Fuglafirði. Tað hevur enn ikki verið tvørligt at fáa penger, men heldur hevur tað verið tvørligt at fáa menn til doktaraembetini og serliga til lev kommunalu doktaraplássini. Eg haldi at tað er rætt at vit skulu hava eitt minstamál av dokturum, og tað skal vera teir distriktsdoktarar, vit hava nú. Viðvíkjandi kommunumdoktaraplássunum mugn vit royna at fáa menn til tey. Viðvíkjandi doktara í Vágum hevur tingið altið stillað seg elskverdugt. Ein stórur partur av tingmonnunum hevur tó ikki viljað verið við til at fáa doktara í Vágum uppá tað, at dokturin í Vestmanna skal fara burtur. Til R. Niclasen skal eg siga, at tann umstendigheit, at vit hava fingið tveir motorbátar til doktarasunar, er eingin loysningur á doktaraspurninginum, spurningar, sum fyrr stóðu óloystir, standa tað enn. Formaðurin upplýsti at mann vildi royna at geva meiri tílskot; tað vísir at man ikki heldur at doktaraspurningurin er endiliga loystur við tað, at vit hava fingið motorbátar. Danski ríksdagurin hevur her játtað pening frá sær sjálvum, og vit eiga ikki at skammast um at so er uttan at vit meina at motorbátarnir eru okkum til skaða. Og vil væl eingin halda tað. Tað hevur verið talað leingi um at fáa motorbátar til at flyta doktaran so væl sum eisini sjúklingar. Nú er tað komið í lag og tað eru vit fegnir fyri. Men eg havi ikki hoyrt at man fatar hetta sum loysningur av doktara sakini. Eg veit, at hrr. J. Patursson hevir stemmað fyri finanslógini utan at tala at, og so haldi eg hann útti ikki at gera tað heldur her. Táið talað hevir verið um, hvat ið regeringin hevir gjort, ið skal hava forðað hesum máli, so veit eg ikki, at regeringin hevir gjort nakað; so vítt eg veit er tað sunnheitsstýrilsið, ið hevir veitt sær til okkara og hvørki regering ella ríksdagur. Ríkisdagurin skal í hvussu er ikki hava orð fyri, at nakað er illa gjort her. Ongar sakir herum eru stoðgaðar í ríkisdegnum, so vítt og veit; hvar sakirnar eru stoðgaðar veit J. Patursson kanska at siga frá; eg havi lisið í einum blaði, at hann veit nógv betri enn eg um, hvat ið gongur fyri seg utan fyri rikisdagin og serliga í ministeriinum. Eg skal gera alt hvat eg kann fyri at vit kunnu fáa hækkað doktaralønirnar so nógv, at vit kunnu fáa nóg mangar doktarar herupp. Tað helt eisini R. Niclasen, táið talað var um doktara til Vágar, so vildi hann hækka lønina har, men so mega vit eisini hækka lønina hjá doktaranum á Eiði og aðra staðni. Vit hava nú fingið statusyvirlit og so kunnu vit fáa at síggja, hvussu nógv vit kunnu lata. Tað er já

so, at vit undir hesum nýggja fleirtali hava flottað okkum við peningastudningi til slíkt, ið eg og vit í okkara partíi halda vera løgtinginum meiri og minni óviðkomandi; vit meintu at vit skuldu gera eftir tí gamla orði: hvad du evner kast av i de nærmeste Krava. Vit eiga yvirfyri doktaraspurninginum at stýðja so nógv, sum vit orka. Her hevir verið talað um at fingið doktarar úr Íslandi, og eg var við til ífjør at innstilla at vit skuldu kunna taka doktarar haðani, um so var at eingir kundu fáast úr Danmark. Vit skrivaðu í betonkningini, at um tað ikki varð loyvt doktarum úr Íslandi at praktisera her, so bóðu vit um, at teir máttu fáa loyvi til tess. Eg haldi, at teir hava loyvi til tess og tað sama halda fleiri aðrir løgtingsmenn. Tað má vera tað sama við tí, sum við apotekara-privilegiinum, áðrenn vit fingu ta nýggju apotekaralógina; so leingi vit onga doktaralóg hava, er tað frítt fyri hvønn doktara at praktisera her. Nakað annað er spurningurin um teir vilja kunna fáa medicin til keyps frá hesum apotekinum, tað tori eg einki at siga um. Men um vit nú hækka lønina fáa vit óivað doktarar úr Danmark og tað er tað, ið vit yvirhøvd mest, eisini havi eg frætt, at tað skal ikki vera so yvirflóð av doktarum í Íslandi, men heldur doktaratrot har uppi.

R. Niclasen: Formaðurin hevir enn ikki svarað mær uppá mín spurning, og og má tí kanska ganga út frá, at íslendskir læknar hava loyvi at praktisera her. Eg vil takka hrr. A. Samuelsen fyri hansara støðu til læknaumsókna í Vágum og vil eg vóna at allir aðrir tingmenn taka undir, so er tann sakin loyst. Tað er viðgingið, at tað var ein feilur, táið administratiónin setti distriktslæknan í Vestmanna í staðin fyri í Vágum, tað hevir sjálvur staðarlækni Hoff viðgingið fleiri ferðir, og tann feilin hava Vágamar liðið undir í 40 ár. Samanliknað við Vágar eru hini læknaembætini væl fyriskipað. Eg vóni, at her verður bøtt um henda feil, og at løgtingið vil geva so stóran studning til kommunulæknan í Vágum sum hini kommunulæknaembætini: Eiði, Sandoy, fáa úr statskassanum. Eg trúgvi ikki, at tað er læknatrot í Íslandi; í hvussu er havi eg hoyrt, at har eru tveir læknar uppi, ið hava viljað søkt til Eiðis, men hava ikki gjørt tað, tí teir hava verið bangnir fyri at missa statstilskotið. Eg vil vóna at løgtingið gevur tann studning, sum statskassin ikki vil geva.

O. Effersøe: Lagtinget har hidtil taget den Stilling, at vi har ønsket nogle Embedslæger, som Staten har betalt, desuden nogle Kommunelæger, til hvilke Lagtinget og Kommunerne yder sit og Staten sit. Det er meningsløst at forlange, at vi skal kunne diktere Regeringsmagten, hvad den skal yde til sine egne Embedsmænd. Det er dog ikke os, som raader for Statskassen. Det gælder om, at vi fremsætter saa gode Forslag, at de bliver fulgt. En anden Sag er, om Lagtinget ønsker en helt anden Ordning af Lægevæsenet, hvis vi ønsker, at Lagtinget skal overtage Lønningen af alle Lægerne. Det er urigtigt, naar det er blevet sagt, at Regeringen ved ikke at gaa ind paa Skatteforslaget har hindret Sagens Gennemførelse. Thi vi kan, hvad Dag det skal være, forhøje Ligningen til Amtsrepartitionsfonden saa meget, at vi faar tilstrækkelig til Lægen paa Vaago.

Formaðurin: Naar Hr. R. Niclasen spurgte, om hvorledes det stillede sig med Ansættelsen af islandske Læger paa Færøerne, naar de havde taget Eksamen fra et andet Universitet end Københavns Universitet, saa kan jeg oplyse, at der er ikke noget i Vejen for at de kan praktisere her paa Færøerne, derimod er der forskellige Vanskeligheder med Udstedelse af Recepter og Udlevering af Medicin, som jeg ikke har present i Øjeblikket, men jeg skal give Udvalget alle Oplysninger herom.

Samtykt varð at beina málið í eina 5-mannanevnd.

Kommunulækni í Vági. (S.)

1. viðgerð.

D. J. Thomsen: Tað er til tingið komið bonarbræv frá teimum 3 syðru sóknum í Suðuroy, um at tað nú verða settur ein lækni suðuri í Vági, og biðja tær tingið geva studning til slíkan lækna og samtíðis mæla til, at studningur eisini verður givin úr statskassanum. Tað er ætlað ein minstaløn av 6000 kr., og kommunurnar vilja byggja læknahús í Vági og fyrisláa at útreiðslan verður býtt sundur uppá kommunurnar eftir fólkatalinum. Tað hevir

verið so, at tað longu er skift sundur í Suðuroy hvat ið viðvíkir prestaembætinum, so at har nú eru 2 prestagjøld, men nú eru oll har suðuri, ið meina, at tað er nógv meira neyðugt, at doktaraembætið verður skift sundur í tvey. Fáa vit 2 læknar, vil tað ikki bert verða til gagns fyri syðru helft men eisini fyri norðari helft á oynni, tí tað er, sum nú er statt ónogguligt fyri ein mann at rokta læknaembætið táið nógv er at gera. Tað er í syðru helft av Suðuroynni o. v. 10-partarin av øllum fólki í Føroyum, so aleina av tí, halda vit okkum vit røttum kunna krevja ein lækna. Tað er ofta tvørligt hjá Sumbingum og eisini hinum at heinta læknan av Tvøroyri, og tað kann eisini ofta vera ringt hjá læknanum at koma so langan veg. Eg havi hoyrt tos um, at motorbátar skulu kunna erstatta læknar; men vit har suðuri mangla ikki motorbátar, teir hava vit nóg mangar, men vit sakna læknar. Eg vil vóna, at tingmenn taka væl undir hetta mál. Eg vil mæla til, at hendan sak fer í somu nevnd sum hin fyrra.

O. Effersøe: Spørgsmaalet har været fremme i flere Aar, og det er ganske naturligt, at det kommer særlig stærkt frem nu. Befolkningen er vokset saa stærkt, og der er al Sandsynlighed for, at den vil vokse hurtigere der end andre Steder paa Færoerne.

Det Tidspunkt har nærmet sig, da Spørgsmaalet maatte løses. Den store Vanskelighed var, at man i den sydlige Del af Suderøen manglede Midler til at overvinde de forskellige Hindringer. Der kræves Garanti for en vis Løn, og der kræves Bolig til Lægen. Da nu Kommunerne har erklæret sig villige til at yde, hvad man i slige Tilfælde plejer at kræve af dem, maa Tiden være inde til, at Lagtinget støtter Sagen og bringer den frem for Regering og Rigsdag. Jeg maa bemærke, at jeg finder ingen Anledning til at sammenligne denne Sag med Sagen om Sønderdelingen i to Præstegæld, de to Sager har ikke noget med hinanden at gøre. — Jeg holdt i sin Tid paa, at man burde opretholde Distriktslægeembedet paa Suderø, da man fra anden Side hævdede, at en Nedlæggelse var nødvendig af Hensyn til den paatænkte Ansættelse af en særlig Læge for Øens sydlige Del, og jeg havde Ret, thi netop ved at opretholde Distriktslægeembedet, er der skabt Mulighed for nærværende Sags Løsning.

Den ærede Taler sagde, at en Læge for den sydlige Del af Øen vil være til Gavn for den nordlige Del; det er ogsaa rigtigt, men Sagen har ogsaa sin Ulempe for os. Saa længe der er een Læge paa Suderø, vil han have større Indtægter end Distriktslægen vil faa, naar Øen er delt i to Distrikter og han kun har den nordlige Del. Efter en Deling vil vi i den nordlige Del derfor kunne regne med at faa en mindre vel uddannet Læge end nu, men det maa vi finde os i. Kravet om to Læger har sin Berettigelse, og jeg vil ogsaa anbefale det til Tinget.

D. J. Thomsen: Tann seinasti ræðari talarin betónar so mikið, at eg framhelt samanlikning millum hesa sak og sundurskiljing í tvey prestagjøld, og at tað ikki kom hesum við, tað skal ikki skiljast soleiðis, at tað er mín meining at ikki allir Suðringar eru glaðir við hesa sundurskiljing, men eg meini, vit eru her begintir frá halanum tí kravið um tveir læknar er og hevur altíð verið storri enn hitt og tá er hetta mál ov seint borið fram.

Th. M. Strøm: Eg má eisini anbefala hesa sakina. Suðroyin hevur verið so stillað, at læknan ikki hevur kunnað yvirkomið alt tað arbeiði, sum hevur hvílt á honum, av tí at hann kann hava verið uptikin á sjúkahúsinum tað mesta av degnum. Ofta er dokturin troyttur, og av tí, at fólk aðrastaðni frá tekur alla hansara tíð, verður ov lítið av hansara tíð og arbeiðsevni til gagn fyri folkið í øllum distriktinum, og verður hann oftast ikki at hitta, um fólk kemur til hansara. Kemur ein doktari afturat, vil tað væl minka um hansara praksis, tó tað er væl eitt undirorðnað spursmál. Tað hevur verið framhildið, at trongdin er stór, og eg vil anbefala sakina til løgtingsins vælvild.

M. A. Winther: Tað er óivað, at tað kunna koma fleiri ynskir fram, ið vit mugu taka hensyn til. — Tað er trongd til at fáa fleiri doktarar í Føroyum, tað má gerast nakað fyri at fáa doktaraspurningin í sína heild løvstan her hjá okkum. Forstandarskapini, fólkið, hevur lagt stórar treytir á seg sjálvan, tað ber stórar byrður. Vit á Sandi geva nógv til doktaran. Tá vit fara til statin, mugu vit finna okkum í, at staturin stillar treytir, og okkara ynski er at gera nakað sjálvir.

Vit biðja ikki um fleiri prestar. Høvdu vit gjørt tað, hevði eingin vandi verið, tá høvdu vit møtt vælvild. Doktarar

vilja hava so stóra løn. Hvussu langt skulu vit ganga við at geva garanti fyri løn, hvussu langt vilja teir driva okkum her, og nær koma vit á mál við doktaralon?

Vit orn ikki førir fyri at geva meir. Sagt er, at vit kunna innskrenka okkurt annað. Løgtingið hevur ikki flottað sær. Samuelsen vil væl ikki siga, at tað er at flotta sær at geva meiri til tingmennirnar, ikki heldur til referat. Vit eru ikki førir fyri at geva nógv. Eg vil mæla til, at tingið tekur sakina við vælvild.

Edv. Mortensen: Hvussu langt skulu vit ganga, hvussu stóra løn skulu vit geva til læknar? Tað má setast mark fyri, hvat kommunur og løgting kunnu geva. Lækni frá Danmark kemur ikki higar, tá hann fær meir har niðri. Til embætið í Suðuroy, sett til yvir 10,000 kr., var bert ein, ið meldaði seg, og tað ein heldur ungur maður ikki serliga kvalificeraður. Vit mugu fáa Føroyingar til embætini í Føroyum. Danskararnir krevja gjarna meiri enn vit, sum búgva her í landinum, og ofta fáa vit enntá ikki tær bestu kreftirnar úr Danmørk.

O. Effersøe: Det er urigtigt at fremdrage Spørgsmaalet om Ansættelse af to Præster paa Suderø og vejo, hvad der er bedst: en Præst eller en Læge. Det er ikke ret at sige, at Sagen kunde have været løst tidligere. Der har fra de lokale Distrikters Side ikke foreligget saadant Tilbud, som man plejer at kræve om Lægebolig og Garanti for en Minimumsindtægt. Sagen har derfor ikke kunnet fremmes tidligere. Der har indtil nu ogsaa været stor Knaphed paa Læger. Men nu synes Forholdet at skulle blive bedre. Der meldte sig vel kun en Ansøger til Distriktslægeembedet paa Suderø; men dette kan have hidrørt fra, at andre Læger gik ud fra, at de ikke kunde konkurrere med den, som søgte Embedet. Jeg ser ikke rettere end, at den, som har faaet Embedet, er vel kvalificeret dertil. Hvordan han vil vise sig at være i Fremtiden, ved jeg ikke. Hr. Mortensens Bemærkning om den nuværende Læge var ikke paa sin Plads og maa give Folk det Indtryk, at han ikke er vel egnet til sin Gerning.

A. Samuelsen: Eg vóni at tað vil lukkast at leggja hesa sak soleiðis, at Vágbingar fáa tann doktara, teir sokja eftir, og at bæði statskassin og vit geva studning hartil. Eg vil tílíka vóna at tá bonarbræv komur fram um doktara í Englafirði, at tað tá kemur í somu nevnd sum hendan sok fer í. Til Winther vil eg siga at vit hava verið væl so flottir við tingreferatinum og samaleiðis við løgtingsdietunum. Tá ein lesur frágreiðingina idag um okkara økonomiska status vil man fáa at siggja, at pálikningin til amtsrepartiónsfondin kemur at verða eitt sindur orðvísi vorðin enn fyrr. Vit vilja gera tað klárt hvat hendan ónoyðuga flottheitin skyldast. Tá talan er um at doktararnir krevja meiri løn, so spyr mann hvar vit skulu enda. Í eygablikkinum meinar summhoitsstýrið at vit skulu enda við 5000 kr. Mortensen meinti, at Føroyingar bliva bíligari sum embætismenn. Tað trúgvi eg ikki. Vit hava t. d. telefoningeriorin, sum er Føroyingur. Og telefonnevndin klagar jú um, at hann vil hava so høga løn. Men Føroyingar eiga eisini at fáa eins stóra løn sum aðrir. Og eg haldi til dømis at Mortonsen um hann verður embætismaður her, eigur at fáa eins góða løn sum teir donsku embætismenn. Eg haldi at um vit seta fram at Føroyingar skulu fáa minni løn vil tað ikki eggja teir til at studera. Viðvíkjandi bemerkuingimun at Suðroyin hevur fingið ein ikki serliga útdannaðan doktara, kann eg siga at tann doktarin hevur verið í mínum tingdømi og har dámdi fólkinum hann væl. Hann hevur eisini fingið sjúkhúsútdanningilsi umfram tað hann hevur praktiserað, og tað skuldi ikki hava gjort hann minni kvalifiseraðan. Maðurin er góður, og hann er eisini raskur at ferðast.

Edv. Mortensen: Tá eg havi hildið fram, at Føroyingar eiga at studera, so er væl eingin tingmaður, sum ikki er samsintur við meg. Hetta vil fyrst menna hinna føroysku tjóðina yvirhovur og síðani gera, at tað verður lættari fyri okkum at fáa embætismenn. Tá tað er so tvorligt at fáa menn til at vera læknar her, so vísir hetta at danskir hava mótvilja til at taka sær pláss, sum liggja langt av leið fra teirra heimlandi. Harímóti koma Føroyingar jú heim til sín sjálvs, tá teir verða embætismenn í Føroyum. Um vit so skulu fáa Danir av ti besta slag, vilja teir krevja meri fyri at fara so langan veg burtur. Tá eg nevndi at tað einans var ein ansøkjari til Suðroynna, so segði eg tað sum dømi uppá, hvussu ringt tað var at fáa doktarar higar. Eg havi ikki sagt, at læknin í Suðroy ikki var kvalifiseraður í forhold til tað útdanningilsi, hann hevur.

Nyholm Debess: Eg vil longu við hosi viðgerð siga, at eg vil styðja hesa sak. Atvoldin er tann, at eg siggi at trongdin til at fáa lækuar í Føroyum er sera stór. Tað letur til, at vit skulu hogt upp við lønunum, um vit skulu fáa doktarar úr Danmørk. Tað sýnti seg við embætinum í Havn: har varð einans ein ansøkjari. Tá tingið ífjør gjørdi ta samtykt, at um vit ikki fingu læknar úr Danmørk, skuldu vit royna at fáa teir úr Íslandi, so var tað berættigað. Men tað vísir sog at her er komið eitt undarligt forhold inn. Henden samtykt má vera misfatað av donskum læknum; tí tá kommunulæknaembætið í Havn fyrru ferð var uppsligið tók ein danskur lækni sína umsókn aftur tí at tingið hevði gjørt slíka viðtøku um íslenskar læknar. Tað gleðir meg, at Effersoe segði, at nú vilja viðurskiftini til at fáa doktarar gerast betri. Men eg vil spyrja um hann her hevur nakað bestemt at halda seg til. Eg meini at viðurskiftini eru alt annað enn góð. Sjálvt um vit vissa 5000 kr. í løn, er tað ikki sagt, at vit fáa danskar læknar. Tað er beklagiligt at vit ikki hava fríar hendur til at skaffa okkum lækuar hvar vit kunnu fáa teir.

A. Samuelsen: Tað er so at vit her á landi mugu hava ungar menn til læknar. Um vit fáa eldri menn, sum hava aldrinn so gott útdannilsi egna teir seg ikki at vera her hjá okkum. Tað kann vera, at onkur doktari er á tí aldri, sum vit vilja hava her, sum er fremri enn Suðuroya doktarin, men eg trúgvi, at hann hevir so gott útdannilsi sum nakar á hansara aldri, vit ynskja jú ikki doktarar her ið eru 60 ár, men ungar menn; Suðuroyingar hava óivað fingið ein so góðan doktara sum teir kunnu fáa. Eg haldi tað vera best at slutta diskussiónina her og fortseta hana í nevndini. Eg veit ikki, um tað skal vísa seg at vera soleiðis sum Nyholm Debess sigir, at tað ið vit samtyktu ífjør, skuldi hava ferðað fyri, at doktarar niðri frá søktu higar; nakað annað er, at um vit tóku menn, ið doktaraforeiningin viðri ikki heldur vera kvalifiseraðar, at teir so vilja boycotta okkum; men tað kann ikki henda fyrr enn vit hava tikið ein íslandskan doktara, at tað kann vera tala um boycotning. Um ein kommuna fyri sínar egnar pengar setur ein íslandskan doktara, so hopi eg ikki tað verður boycotning; tað hendir fyrst táið ein sovorðin verður settur til embætisdoktara.

N. Debess: Eg trúgvi, at hrr. Samuelsen og eg oru heilt samsintir í hesum spurningi um at skaffa Føroyum læknar. Hann undraðist yvir míni úttalilsir um, at ein lækni vegna eina løgtingsviðoku hevði tikið umsóku sína aftur. Tað var ikki leyst talað, men tíverri satt.

Samtykt varð at beina málið í eina 5-mannanevnd.

Styrkur til keyp av einari kúgv.

1. viðgerð.

J. Guttesen: Hetta mál er eitt andragandi frá einum fátækum manni i Tjørnuvík, hvarí hann biður um styrk til at keypa sær eina kúgv. Hann eigur ongan eigindóm og hevir verið so óheldugur í 14 ár at hava mist 4 kýr líka sum tær hava kálvað, og hann hevir ikki ráð til at keypa sær kúgv aftur. Hvat ið vit kunnu gera fyri honum skal eg ikki kunna siga nú, men eg skal mæla til, at málið fer í nevnd. Her var eitt bønarbræv fyri einum ári síðani frá einum manni ið hevði mist nógvan seyð, so vítt eg minnist fekk hann nakran studning. Hetta mál er nakað líknandi. Eg skal mæla til at málið verður vist til fíggjarnevndina.

M. Samuelsen: Eg skal takka Guttesen fyri hansara stoðu til hesa sak. Hesin maður hevir verið so óheldugur, at hann ferð eftir ferð hevur mist kýr, ialt eru 4 kýr deyðar hjá honum í 12 ár. Hesar kýr hava ikki verið rakneyt, so tað er ikki tí tær eru deyðar, tann seinasta var so ógviliga feit, tað kann djóralæknin bevitna. Maðurin fekk eitt sindur fyri kroppin, tað var alt, men tapið var stórt og hann hevir ikki ráð til at gjalda fyri eina nýggja kúgv. Um tað skal vera so, at tingið skal betala hvørja kúgv sum doyr óhelduga, verður tað kanska nakað nógv, men eg vil anbefalla, at royna at gera okkurt fyri mannin og vil eg anbefalla at vit vísa sakini til budgetútvalgið.

R. Niclasen: Tað er sjálvandi ofta ringt at gera við táið sovorðin óheld bera á sum her hjá hesum manni norðuri í Tjørnuvík, og eg kann unna honum alla ta hjálp, hann kann fáa. Tó kundi tað verið ein spurningur, um maðurin ikki

átti at hava vent sær til hjálpukassan í sóknini og har kanska fingið hjálp, so at hesi sak ikki hevði nýtst at koma inn á ting.

J. Patursson: Eg eri ikki heilt inni í hesum máli, men tað vísir hvussu lítið er gjørt her á landi fyri landbúnaðinum. Aðra staðni er tað so, at teir hava djóratryggingarfelog, har menn árliga lata 5—6 kr., og so kunnu teir fáa djór teirra aftur goldin, um tey doyggja av óhappi; í Føroyum er einki sovorðið gjørt. Nú hevir Bóndafelagið, tað av ollum happpaða Bóndafelag, ætlað at stovna eitt sovorðið tryggingarfelag; hovdu vit haft eitt sovorðið og um maðurin hevði verið limur, hevði hann verið hjálptur. Mær tykir synd í hesum manni, og um tingið kann, mega vit hjálpa honum.

M. Samuelsen: Til hrr. Rasmus Niclasen vil eg siga, at honum nýtist ikki at vísa manninum til hjálpukassan, tí hann veit hann um, og so skuldi hetta væl verið betraktað sum ekstra dýrtíðarhjálp, men tað er ikki meiningin. Til hrr. Jóannes Patursson vil eg siga, at hesin maður hevði ikki so nógv treysti til at tingið fór at taka undir hesa sak, tað var ikki tí, hann søkti, men tí hann er ein fatækur maður, ið ikki sær seg føran fyri at fáa sær kúgv aftur. Eg minnist meg hava hoyrt frá sagt, frá eini tíð ið liggur framman undan hesari, at táið ein fátækur maður tá á døgum hevði mist eina kúgv, tá fór hann til abba Jóannesar Patursson í Kirkjubø og har fekk hann straks eina kúgv út av básinum fyri púra einki. Eg trúgvi ikki, at tað vildi nytta einum fátækum manni stórt nú á døgum at farið til Kirkjubíggjar at fáa sær kúgv.

O. Effersøe: Hr. Patursson har den Vane altid at klage over, at intet er gjort af det offentlige. Det forekommer mig, at man aldeles ikke her kan bebrejde det offentlige noget, her er det udelukkende Landbrugerne, der er Skyld i, at intet er gjort for at forebygge saadan Skade.

J. Patursson: Eg skilti ikki heilt hrr. Effersøe, men eg meini at tað man vera ein feilur av hrr. Effersøe sjálvum, at einki er komið í lag, tí so vítt og veit hevir hann sjálvur kúgv, í hvussu er hevði pápi hansara kúgv. Eg veit ikki hví hrr. Effersøe og tingmaðurin í Vík blivu so illir bert tí eg segði nøkur orð. At Mikkjal Samuelsen gjordi abba mín til so stóran mann, kann bert gleða meg. Tað má hava verið ónatúrliga nógv neyt abbi mín man hava átt, síðani hann kann hava fingið hildið allar Føroyar við kúm.

O. Effersøe: Jeg var hverken argur ella illur, jeg fremsatte blot en alvorlig Advarsel. Min Fader var Mand for sig; lad ham ligge i sin Grav, og hvad mig angaar, saa har jeg ingen Ko og hverken er eller har været Landbruger.

Samtykt varð at beina sakina í tíggjarnevndina.

Frítaking fyri at vera limur av valnevnd.

1. viðgerð.

Th. M. Strøm: Tað er bon frá harra Debes Mortensen á Tvorovri um at verða fríur fyri at vera í valnevnd fyri Suðroy. Hann heldur seg ikki longur vera føran fyri tað starvið.

O. Effersøe: Det er jo saa lige til. Vi vælger vist Valgnævn hvert Aar. Jeg har forresten ikke noget imod, at Sagen gaar i det kommunale Udvalg, hvor den vist dog ikke hører hjemme.

Umsókn frá Vágskommunu um lántoku.

1. viðgerð.

D. J. Thomsen: Eg lovvi mær at bera fram eitt andragandi frá forstandarskapinum í Vági, hvar tað biður løgtingið royna at gera útvegir til, at tað má lukkast teim at fáa eitt lán frá statinum ella einum peningainstitutti, stórt 3 á 400,000 kr. pí bíligasta máta, lága rentu og langa avbetalingstíð. — Tað kann moguligt sigast, at hettar andr. kemur nóg so tíðliga inn á tingi. Tað var viðtikið í fjor, at ingeniørar skuldu koma at ransaka allar vatnkreftur í Føroyalandi, 2 hava verið har suðuri í Vági og kannað eftir viðurskiftunum fyri einari kraftstatión, teir hava enn ikki kunnað ella viljað útlalað seg, teir skulu jú geva frásøgn til løgtingið. Teir hava góða vón um eitt stórt kraftverk í Vági og vilja koma aftur til Vágs at gera yvirslag

og byggiplan. Eitt slíkt verk hevur stóran týdning fyri Vág, tað týðir bíligt og dúmligt ljós og ikki minst varma, erstattar okkum torv, sum bæði er torfort og dýrt at fáa. Einki torv er at fáa í Vági, vit mugu fáa okkum torv frá øðrum, úr Sumba og Hovi, Porkeri og Orðavík. Tað kann verða so, at teir siga: nei, nú tora vit ikki longur at lata og so hava vit einki torv! Forstandarskapið sær, at vit mugu fáa verkið í gongd, tí tað hevur so stóran týdning fyri okkum á so mangan hátt, t. d. drivkraft. Tað var mognligt, at tað var til frama fyri okkara fiskaeksport. Tað er konstaterað í Noreg, at tann elektriska kraftin egnar seg væl til fiskaturking. Tað var gleðiligt, nu vit kundu komið til at nýta regnið til at turka fisk við, og tað vil væl løna seg fyri kommununa. Steinolju- og kolkostnaðin vil koma til o. u. 100,000 kr. um árið. Uppskot vil koma til løgtingið um stutta tíð, eg vil tilmæla sakina til vælvild løgtingsins og vísi hana til nevndina ið hever við hesar sakir at gera.

O. Effersøe: Jeg nærer det Haab, at Sagen vil faa stor og gavnlig Betydning, og jeg maa fremhæve Nødvendigheden af, at Sagen i Udvalget lægges vel til Rette. Der maa skaffes tilstrækkelige Oplysninger, og det vil der jo blive Lejlighed til senere.

J. Patursson tilmælir, at henda sak verður víst til somu nevnd.

Th. M. Strom: Eg vil bíða við at úttala meg til seinri, tá ið sakin liggur fyri í tinginum.

O. Effersøe: Sagen er ot decideret kommunalt Spørgsmaal. Vi maa faa Sagen i et Udvalg, og jeg vil støtte den paa det bedste. Jeg maa betragte det som absolut heldigt at fremme disse Sager som kommunale Sager.

A. Samuelsen: Eg eri glaður yvir, at hettar andragandi er komið, og eg eri klárur yvir, at vit nú eru komnir á beina leið. Eg vænti, at Vágbingar blíva teir fyrstu ið fáa elektricitet. Tann kommunala leiðin er tann beina. Var tað so alla staðni, vóru Føroyingar ikki so ósundurpettaðir, sum teir eru. Spurningurin um approbatión hoyrir heima í tí kommunalu nevndini. Eg eri ikki ímótur, at henda sak fer í ta elektrisku nevndina.

P. Nielsen: Eg vil siga nøkur fá orð, og at eg vil styðja sakina. Tó haldi eg ikki, at tað rættasta er, at Vág fær kommunalt verk. Eitt stórt verk, sum ætlan er at verða fyri alla ovnna, hevur storri týdning. Tað vil verða betri, at oll Suðroy fær kraft frá tí stóra verkinum (Kraftstation), tað vil eisini bliva bíligari enn eitt minni, kommunalt verk. Eg vil tilmæla sakina.

Expropriatión viðvíkjandi elektriskum máttstoðum.

I. viðgerð.

H. C. W.-Tórshavn: Henda sak er skrivilsi frá Havnar byráð til tingið um at upptaka til viðgerð nám av vatnsvídd til elektricitetsverk. Havnar kommuna hevur í umbúna at byggja elektricitetsverk í Havn, og tað raðar tí um at fáa ræði yvir tí vatni og tí vídd sum nýtast skulu. Tað hevur eisini týdning fyri allar Føroyar, við tað, at aðrar kommunur ætla tað sama. Eg vil tí vóna at tingið tekur væl við hesi sak í hesi samkomu. Í skrivilsinum er sipað til ta íslendsku lógina í 1915; men tann lógin talar einans um at føra eloktricitet yvir annans manns jørð. Men tað er ein onnur íslendsk lóg av 1907, sum betri ber til at nýtast her. Eg havi eisini sum limur av fossanevndini sæð stóran hóp av lógum úr Noreg. Tær kunnu eisini vera okkum til hjálpar. Her eru tó í okkara landi serlig viðurskifti, sum vit mugu geva gætur, t. d. torvskurðarættur. Og so er ein stórur partur av føroyskari jørð kongsjørð. Eg haldi, at hesin spurningur ikki reiðiliga hoyrir í ta nevnd, sum sett er í elektricitetsmálinum í tað heila tikið. Eg vil tí skjóta upp at vit her seta eina nevnd av 5 monnum.

J. Patursson: Tað er vitiligt, at lóg er hent, tá vit seta slík stórverk ílag. Vit hava onga løggeving fingið í vegmálinum. Vit hava gjørt okkurt so við og við men veglóg hava vit onga fingið. Í N. Winthers tíð var í ríksdaginum talað um eina veglóg; men eingin er komin enn. Í telefonmálinum er frægari. Tað komst av, tá telefon skuldi leggjast úr Vestmanna til Havnar; tá vóru eigarar, sum søgdu kortanei fyri at steyrar skuldu setast niður í teirra jørð. Nú skjýtur Havnar byráð

á at vit skulu gera eina tøkulóg. Havnarmenn ynskja atgongd til at taka vatn frá øðrum. Man hevur altíð verið eymur við at taka frá oðrum, tí hevur verið ansa eftir at gera sum best, tá tílíkar lógir hava verið gjørdar. Um ánararnir vísa trekheit til at lata, tá fer man at fyriseta tøkulógir. Men tað er sjálvsagt beint nú vit fara at gera eina fossalóg at koyra hesa sak í ta fossanevnd, sum sett er. Av teim lógum, sum mær eru kunnugar um tøku av vatni halda danskar lógir sær til rómerska rættin, at á og vatn er almanna egn. Í Noreg sigir gulatingslógin, Magnus Lagabøturs lóg og Norska lóg at vatnið hoyrir til eigindómin. Í Norsku lóg sigst: at grundejeren har ret til det vand, som er paa grunden. Í Íslandi stríðast teir í fossanevndini har. Eg havi fingið sendandi eitt uppskot frá fossanevndini har. Har sigst at vatn fylgir ognini antin tað rennur ella er kvirt. Har sigst altso at jørðin eigir alt vatnið, sum á henni er. Men ein annar partur av nevndini er ímóti hesum. Í Íslandi eru tílíkar stórar almenningar, so at viðurskiftini har vera øðrvísi enn her. Men um alt hetta kann hugsast í eini nevnd. Tað sum umræður er, er at vit eru samsintir í at fáa hetta stórverk til besta gagn fyri land okkara. Tað er jú nú nóg so trupult við at fáa ljós og nógv verri at skaffa tað vit skulu brenna. og hartil oyðir torvskurðurin ár um annað ein heilan nationalformúga. Eg skal mæla til at taka við hesi umsókn frá Havnarmonnum.

O. Effersøe: Jeg mener, at vi har Grund til at faa en Ekspropriationslov med Hensyn til Udnyttelsen af Vandkraft. Jeg henleder derhos Opmærksomheden paa, at den nuværende Fremgangsmaade ved Ekspropriation er meget uheldig og altfor vidtloftig, og vanskelig at anvende. Fremgangsmaaden bør gøres lettere, men samtidig maa det dog selvfølgelig fastholdes, at de, fra hvem man ekproprierer, maa faa fuld Erstatning.

A. Samuelsen: Eg slutti meg til sísta røðara. Eg eri ikki fegin við at ekspropriera; men tað er jú neyðugt við hvørt. Tað er rímiligt, at tá man fer undir eitt slíkt stórt mál, nýtast ekspropriatiónsreglur. Eg eri glaður, at man frá øllum síðum tekur væl undir hetta. Eisini tingmaðurin í Kirkjubø sýnist at vera við. Tað er kanske ikki so vanskiligt her í Føroyum at fáa eina tílíka lóg í lag. Vatn og áir eru ikki alt privat egn her. Staturin eigir helvtina av jørðini. Men mann má avfinna seg við brúkarnar um brúksrætt teirra. Men ekspropriatión av áum verður toluliga lætt at fáa ílag. Viðvíkjandi rættindum á Íslandi. Danmørk og Noreg skal eg ikki nerta við tað. Men eg taki tó forbehold yvir fyri Patursson læru um hvat rættur er her á landi. Hann segði at áirnar eru privat egn. Tað er jú ikki so. Ein stórur partur er offentlig egn, við tað at staturin eigur tær.

J. Patursson: Eg segði ikki í privatari egn, og segði at tað mátti takast hensyn til grundeigararnar. Vit kunnu ikki seta okkum til dómarar um hvussu stóran part staturin eigur, tað verður hægstirættur, ið skal doma har. Vit hava fingið svar frá justitsministeriinum, ið var gott fyri okkum, tó er tað jú ikki sagt at hægstirættur taknr somu støðu sum ministeriið.

A. Samuelsen: Nú sigir hrr. Jóannes Patursson, at hann ikki hevir sagt nakað um eigararnar, men um grundeigararnar. Ja, tað er fyri ein stóran part staturin, ið eigur grundina. Vit vita allir, at tað er staturin, ið eigur kongsgarðarnar og ikki bønduruir, hóast eg eigi eina bók, hvar ein kongsbóndi sigir seg at eiga sín garð.

J. Patursson: Tað er best at nevna bók, ið Andrass Sámalsson sipar til; tað er ein bók ið er útgivin um allar ríkisdagsmennirnar; eg síggi at teir hava tikið meg uppi har sum ánara av Kirkjubøgarði, tað havi eg sjálvsagt aldri givið upp, men eg havi ikki lagt í at fáa tað rættað av tí, at tað ger tað sama har niðri. Teir menn, sum sita fyri kongsgørðunum, hava eina serliga støðu bæði eftir teirra festibrævi og eftir norsku lóg. tað nyttar okkum einki at tosa um hetta her. Nakrir bøndur fara kanska at siga: vit vilja hava alt, so verður har ein dráttur millum teir og statin, og har verður tað hægstirættur, ið skal doma ímillum.

A. Samuelsen: Eg trúgvi, at staturin eigur kongsgarðarnar, men bønduruir hava brúksrættin, so tað mega teir hava viðurlag fyri. Bókin, ið eg umtalaði, er útgivin av ríkisdegnum eftir skriftligum upplýsingum frá ríkisdagsmonnunum, so hatta má hava verið »spøg« frá hrr. Patursson, hann kann ikki hava givið sovorðnar upp-

lýsingar í álvara. Og tó hevur hann gjørt tað.

J. Patursson: Kanska tað eisini var ein «spøgu frá hrr. Samuelsens síðu, táið tað stóð um hann í bókini, eg minnist ikki um hann hevði verið bæði fúti og sorinskrivari ella annað.

.

A. Samuelsen: Eg havi ikki kannað nær inntøkurnar av nøkrum embæti, ið eg ikki havi haft; eg havi í bókini nevnt, at eg havi verið konstitueraður sum fúti, og tað havi eg eisini verið. Hr. J. Patursson hevir har ímóti framstillað seg sum eigara av Kirkjubøgarði, 26 merkur, hvat hann við ongum rætti kann gera.

Málið varð beint í nevndina fyri elektricitetsmálinum.

Fundur miðvikudag 6. august.

Skúlahús á Hellunum.

1. viðgerð.

.....

Prósturin: Í hesum máli er eitt bræv komið frá forstandarskapinum í Fuglafjarðarsókn, har teir biðja um stuðning til eina skúlastovu á Hellunum. Hetta mál var frammi eisini í 1915. Tá var søkt bæði um skúlastovu á Hellunum og í Funningsbotni, men tingið helt tá, at einki kundi verða gjørt, av tí at barnatalið í Funningsbotni var so lítið, og eisini var sakin ov lítið upplýst. Teir bjóðaðu pliktarbeið har norðuri, so mikið sum tørvaðist, men tingið helt, at teir fyri at fáa statsstuðningin eisini máttu gjalda tann pening ið vanliga krevst av kommunum, og eisini átaka sær at halda húsini væl rokt. Nú er sakin afturkomin, tó nevnist einki um skúlastovu í Funningsbotni. Nú eru á Hellunum 18 skúlafør børn, og hetta er so nógv, at tað gerst neyðugt at byggja skúlastovu til teirra, tí 18 børn er ov nógv at hava inni í einari vanligari føroyskari stovu. Eisini eru skúlastovur bygdar í bygdum, hvar talið á skúlaførum børnum er minni, t. d. á Hvítanesi. Nú sigir forstandarskapið, at teir vilja lata so nógv, ið vanliga krevst av kommunum fyri at fáa statsstuðning og taka teir sær uppá at umsita húsini. Eg haldi tað verða neyðugt at hetta mál verður væl undirtikið, og vóni at tingið er sinnað til at gera nakað her. Eg vil mæla til, at málið fer til kirkjukassanevndina.

A. Samuelsen: Eg kann slutta meg til tað, ið prósturin segði um hesa sak. Tað er neyðugt, at vit fáa skúlastovu á Hellunum. Har eru nú 18 skúlapliktug børn, og teir vænta, at tað næsta úr verða enn fleiri, av tí at fleiri eru komin fram undir tann aldur. So vil eg siga nøkur orð um nakað, ið ikki bert nertir við hesa sak, men eisini við skúlamál yvirhovur heruppi. Fyri Hellumar søkist um, at tað vanliga tilskot verður størri enn tað plagar. Hetta ynski er ikki órimiligt, tí tíðirnar eru so nógv øðrvísi, nú enn táið reglur um statstilskot vóru gjørdar. Táð var roknað eitt tilskot av 1400 kr. frá statskassanum til bygging av einari skúlastovu, og tað var mett til helft av tí, stovan kostaði; nú vilja 2800 kr. ikki muna nakað til eina slíka stovu, og eg vil tí biðja kirkjukassanevndina hugsa um, at hetta er nógv ov lítið tilskot. Prósturin nevndi, at hetta uppskotið ikki segði nakað um skúlastovu í Funningsbotni; tað er tí at søknirnar nú eru sundurskildar. Spursmál um skúlastovu í Funningsbotni er ikki komið fram í ár, tað kemur kanska næsta ár; eisini í Funningsbotni er stór trongd til eina skúlastovu.

Málið varð beint í kirkjukassanevndina.

. . . .

Skúlahús í Vági. (S.)

1. viðgerð.

Prósturin: Forstandarskapið suðuri í Vági biður tingið um loyvi at selja hin gamla skúlan og byggja nýggjan skúla við sethúsum til læraran. Táið vit hyggja eftir skúlaviðurskiftunum í Føroyum sum heild, so tykist tað sum so, at nú er fyrsti ungangur liðugur og vit skulu til at byrja næsta ungang í útviklingini. Vit hava fingið skúlar í flest øllum bygdum. Men nú eru teir fyrstu skúlarnir vorðnir ov gamlir, ov smáir og ov ringir, og nú koma umsóknirnar til okkara um at fáa teir umbygdar ella fáa nýggjar og betri skúlar. Í mongum bygdum eru longu

skúlarnir bygdir storri, har teir vóru nógv ov lítlir. Nú táið vit kunna vænta at fáa mongar sovorðnar umsóknir, vil eg siga, at vit mega ansa eitt sindur oftir, hvussu skúlar nir verða bygdir. Teir gomlu skúlar vóru bygdir í einari tíð, ið var fátækari enn okkara, og eingin kann siga um teir, at teir eru til prýðis fyri bygdirnar, hvat teir tó áttu at verið, um sjálvsagt tað fyrsta krav til teirra má vera, at teir verða praktiskir. Vit eiga tí at ansa eftir, at menn fáa yvirsjón við hesum arboiði, ið hava skil á skúlabygging, so skúlarnir bæði verða góðir skúlatøknisk sæð og prýðiligir fyri bygdirnar.

Í teirri søk. vit her í dag hava til umroðu, biður forstandarskapið um lovvi til at selja tann gl. skúlan og søkir tilskot til at byggja ein nýggjan skúlabygning. Hin gl. skúlin er ovlítil, tað er tvær reisur vaxið um hann, fyrst varð gjørd ein skúlastova aftur at, og sethúsini vórðu gjørd større; síðan eru øll sethúsini tikin til skúlastovur. Hús vórðu tá leigað til læraran. Nú eru tríggjar skúlastovur, og um framt ein, ið verður brukt til gymnastik. Teir meina, at um fá ár vil hetta verða ovlítið, tí barnatalið veksur nógv og skjótt. Nakað annað, ið ger, at skúlin, sum hann er, ikki hóskar so væl, er at hann ikki liggur væl fyri, nógv børn hava ov langan veg til skúlan.

Mangir ynskja tveir skúlar, hvor í sínum staði í bygdini, og tala um at taka eini hús, sum í sínari tíð vóru bygd til annað brúk - - til skúlastovu; men tað haldi eg ikki ber til. Eini hús, ið eru bygd til eitt annað endamál, vilja valla verða hóskandi til skúlastovu. Eg haldi í tað heila og stóra ikki, at tað ikki er hóskandi at hava fleiri skúlar í sonn bygd; tað er betri, at skúlin er samlaður, tað gongur betri við arbeiðinum tá, enn tá ið børnini eru býtt sundur í tvíningar. Tað kundi væl verið, at kennararnir ikki vóru líka dugandi, vóru børnini tá býtt sundur, bleiv úrslitið tað, at summi børnini fingu ringari undirvísing enn onnur. Fyri børnini er tað betri, at skúlin er ein og tað vil eg tilmæla. Forstandarskapið vil hava skúlan fluttan úr stað, hann stendur ikki væl, tað er mýru kent, har sum hann stendur, fiskaturkiplass eru rundanum, og nógv børn hava langan veg til skúlans. Teir vilja hava hann meiri miðskeiðis í bygdini og meina, at sethús skulu verða saman við skúlanum. So var tað spurningurin um lovvi til at selja tann gl. skúlan. Mær dámar tað ikki, tó, tað eru reint persónligar kenslur, so eg seti meg ikki móti tí. Ætlan er at byggja træhús og klæða við jarni: tað vandiga hevur verið at byggja av gróti, so eg veit ikki, hvat ið tingið signr til hetta. Eg má halda, at grót hevur nógv framfyri við, tað er meira monumentalt.

Tokning og yvirslag er ikki við enn. Eg tilmæli at sakin fer í kirkjukassanevndina.

O. Effersøe: Jeg kan i al Almindelighed slutte mig til Provstens Udtalelser. Jeg har ofte fremhævet den uforsvarlige Fremgangsmaade ved Opførelse af Skolebygninger. Jeg har set Tegninger til Normalskoler, men saadanne er vist aldrig bleven anvendt. Paa disse Tegninger var f. Eks. angivet et Ventilationssystem, som er en vigtig Ting. Men Systemet er vist meget sjælden blevet anvendt, og hvor det er anvendt, har det neppe fungeret. Jeg maa tilraade, at man herefter fører et meget skarpt Tilsyn med Skolebygninger, at de bliver tidssvarende.

Det er jo meget tiltalende at bygge af Sten, men der maa vel tages Hensyn til, om Materialet kan faas paa Pladsen. Paa Suderø er man ikke heldig stillet, da det Stenmateriale, der findes, ikke er vel egnet; men maaske man kunde støbe af Cement og Sten. Det er forresten min Opfattelse, at Tømmer med Jernbeklædning er et godt Bygningsmateriale, naar man passer godt paa, saa Pladerne ikke under Transport o. l. kommer i Berøring med Saltvand og angribes af Rust. Naar man tænker paa Udvidelse eller anden Forandring, er Tømmer det bedste, men naturligvis, strøng Kontrol med Materialet. Jeg har ikke noget at indvende imod, at Skolen bliver opført af Tømmer; men jeg maa undre mig over, at man i Vaag i disse Tider tænker paa at bygge, Forholdene er jo saa uhyre ugunstige. Dog, det varer jo noget, inden man faar realiseret Planen, saa Priserne kan til den Tid være faldne. Jeg vil anbefale Sagen, ogsaa det at sælge den gamle Skolebygning; thi det er absolut rigtig at koncentrere. I Frodebo Sogn byggede vi i sin Tid flere Skoler, fordi Folk absolut krævede det, men dette har haft sine svage Sider. At Børn ikke i samme Sogn saa vidt muligt besøger samme Skole, har store Ulemper, baade er Driften dyrere og Resultatet af Undervisningen daarligere. I Kongeriget har man mange Steder de saakaldte For-

skolelærerinder, der er billigere, og som vi ogsaa vil kunne anvende paa visse Steder.

J. Patursson: Eg havi tikið orðið fyri at tala um ta almennu skúlabygging. Tí sært nevvan so ljót hús, sum skúlarnar. Tað ræður eisini um, at børnini fáa ans fyri vakurleika, og hann vekist ikki av at síggja hosar bygningar: eygnni skulu jú hava nakað sigur orðatakið, og tað var best fyri børnini, at tey blunðaðu. tá tey kunnu skúlanum í eygsjón. Skúlin skal jú vera teim eitt annað heim, har ræður um, at tey fáa tað, vakurt er, at sjá. Vit mugu fáa í lag samarbeiði millum dugandi verkfrøðingar og okkara byggimeistarar her á landi.

S. P. úr Konoy: Eg kann slutta meg til próstin, tó eg hoyrdi ikki alt, hann segði. Tað er keðiligt, at vit ongar tekningar hava. Løgtingið hevur givið til tekningar í øðrum málum, so tað kundi væl verið talan um, at tað eisini gjørdi nakað fyri at fáa tekningar til skúlahús her á landi. Teir skúlar vit hava eru ikki fýsisligir og minni enn so hildnir væl viðlíka. Viðvíkjandi ein ella tveir skúlar er at siga, at tað er dráttur millum mannа; nøkrir vilja centralisera, aðrir ikki. Tað hevur netup verið frammi at draga fleiri skúlar saman í stórar centralskúlar. Skúlarnir mugu byggjast betri og meiri hóskandi, tað er ikki nokk, at vit hava skúlastovur; børnini skulu hava rúm at vera í, so tey eru heit og turr. Tað má í framtíðini verða so, at børn mugu kunna fáa heitt at drekka í skúlanum. Tað er betri at byggja stórar og væl útgjørdar skúlar, um teir vera færri, enn at byggja nógvar smáar. Tað kundi vera ein skúli fyri Tvøroyri og Froðba staðin fyri at nú eru tveir, og annar av teimum nú er lítil. Samaleiðis í Sandavági og Miðvági. Tað er betri at gera skúlarnar soleiðis, at børnini sum koma í skúlan, ikki skulu hava ta kenslu at tey koma til eitt fremmant stað. Tað ræður minni um at børnini vegna óveður og veglongd endiliga skulu møta í skúlanum hvønn dag. Skúlarnir mugu gerast til eitt gott og heimligt pláss bæði fyri børnini og lærarnar. Tað er soleiðis betri viðvíkjandi Syðra- og Norðagøtu at byggja eitt skúlahús mitt í staðnum enn tvey smærri, eitt í hvørjum plássi. Vit mugu koma burtur frá tí at skúlin stendur sum ein kaldur bygningur. Hann skal vera eitt heim fyri børn og lærarar. Viðvíkjandi bygningstilfari, tykjast. sum enn er statt, hús av gróti at vera slavin her í okkara veðurlag. Annars hava hús av gróti sín fordail. Og vit hava dømi um at eldri skúlahús av timbri eru ógviliga illa farin. Eg vil vóna at tingið vil gera nakað fyri at kunna finna eina bestemta tvgm framm, sum er hóskandi her. Eg mæli til at sakin fer til kirkjukassanevndina.

Sakin fór í kirkjukassanevndina.

Brúgv um Hórará.

1. viðgerð.

J. Guttesen: Hetta er sak frá forstandarskapinum í Vestmanna; teir biðja tingið um studning til brúgv um Hórará. Tað hevur fyrr verið træbrúgv; hon er nú gomul og ónýtandi. Tað sum tilsíðst heilt tók brúnna av lagi, var ein á sum kom at leypa. Tað liggur einki frammi um hvat ein nýggj brúgv vil kosta, og eg vil tí biðja tingið gera rannsókn um kostnaðin í summar. Eg mæli til at sakin fer í figgjarnevndina.

Sakin varð heind í figgjarnevndina.

Studningur til byggingar av sjúkrahusi í Vestmanna.

1. viðgerð.

J. Guttesen: Hendan sak er ikki nýggj á tingi. Hon var her í 1907 og 1908, og hon hevur verið væl undirtikin og anbefallað til studning av ríkiskassanum. Tekningar og plánur vóru send til ministeriið; men ministeriið hevur úttalað at teir ikki hava verið væl tilfriðs við tekningar og plánin, og teir biðja tí um nýggjar. Forstandarskapið í Vestmanna hevur so ikki gjørt meira við tað. Ministeriið hevur eisini spurt tingið hvussu tað hugsar sær til at undirskotið skal dekkast sum eykst av sjúkrahúsdriftini, og tingið hevur sent spurningin viðari til forstandarskapið; men her uppá hevur forstandarskapið ikki svarað, og so er væl sakin løgd til síðu. Tað er

stór trongd til sjúkhús í Vestmanna. Havnin har søkist av eini nógd av skipum, bæði innlendskum og útlendskum, har imillum av nógvum trolarum, og tað hendir seg mangan, at tað vera legd fólk frá hesum skipum inn til at undirsokjast; men har er tó eingi hús at koma til hjá sjúklingunum. Men tá skipini skulu vera noydd at sokja aðra staðnis við teim, verður tað ofta til miklar útreiðslur og tíðarspell fyri skipini. Forstandarskapið hevur tí meint, at tað ikki longur er forsvarligt einki sjúkrahús at hava og biður nú aftur tingið um passandi tilskot. Forstandarskapið nevnir eisini at tað fyriliggur plánur og yvirslag, men hetta eru teir sonn plánar og yvirsløg, sum ministeriið ikki sýntist um, og tí verður man noyddur til at fáa nýggjar tekningar, ialtfall yvirslag av nýggjum. Eg vil biðja tingið taka væl við hesi søk og eg vil mæla til at hon fer í nevndina fyri lokna málinum.

A. Samuelsen: Eg vil eisini mæla tinginum til at taka væl við hesi søk og vóni at tingið ger tað eins væl í ár sum í 1907. Tá var væl ikki so lítil mótstandur móti at fyritaka nakað, men tó bleiv tað samtykt tá at mæla til, at mann frá ríkiskassanum fekk ein studning uppá 12,000 kr. annaðhvørt sum tilskot ella nakað av tí sum lán til 6 pct. rentu. Sakin kom fyri aftur á tingi fleiri ferðir bæði í 1908 og árini eftir, og í 1912 av tí at forstandarskapið í Vestmanna bað um at fáa stedgu sakini. Tað var ikki av tí, at mann ikki ynksti sjúkrahús, men tí at mann ikki kundi skaffa betingilsir fyri at fáa húsið. Húsið skuldi byggjast og esini drívast, og man tordi ikki at plikta seg til at gjalda undirskotið. Mann hevði jú dømir bæði úr Suðroy og úr Klaksvík. Tá nú er komið lív aftur í sakina, so eri eg fegin, tí at og í sini tíð var tingmaður fyri Norðstreymoy og eg og fleiri vóru tá við sakini. Mín støða er tann sama í ár sum tá. Eg vil gera hvat eg kann fyri hetta sjúkhúsið, og serliga er tað neyðugt at gera nakað her, tá man hevur læknasetur í eini so mikið trafikeraði havn sum Vestmanna er. Men um man sær burtur frá havnini, so er tað brúk fyri einum sjúkrahúsi har sum læknir er. Guttesen brikslar mær á sinni at eg havi spilt sakina; men tá hann lesur frágreiðingina um hana fyri 1912, sær hann at tað er forstandarskapið, sum sjálvt hevur biðið um at hon skuldi støggast. Eg skilji tí ikki at haun í sini tíð gjørdi álop á meg. Mau eigir ikki at tala um ting, sum ein einki veit um.

J. Guttesen: Eg skal takka tingmanninum úr Fuglafirði fyri, at hann tók so væl undir hesum máli, men síðani kom hann fram við nokrum, ið eg ikki so væl kann takka fyri, tá hann helt at eg átti at biðja seg um forlátilsi her í salinum, tað fari eg ongan hug at hava til. Hatta, hann segði um veljarafundin í Vestmanna, var beint. Tað var sagt mær, og tað var almindiligt tos har norðuri, at hann átti skyldina fyri at sjúkhús okkara ikki var komið til byggingar, og tað bar eg fram fyri at vita um tað var so. Sýslumaðurin reinskaði seg fyri hesum, og eg haldi heldur at eg havi gjort honum eina tænastu, við at gera tað almannakunnugt, at hann onga skyld hevði í hesum, og tað átti hann at takka mær fyri. Eg skilti tí ikki, hví hann dró hetta fram her í dag.

A. Samuelsen: Eg skal takka hr. Guttesen fyri, at hann á sinni bar hoð fram fyri meg um, at tað var almindiligt tos í Vestmanna, at eg skuldi eiga skyldina fyri at sjúkhússakin var stansað, men eg veit, at eg var ósekur. Eg skal ikki krevja av Guttesen, at hann biður meg um forlátilsi: hann hevir viðgingið her í dag, at hann, táið hann leyp á meg har norðuri, gjørdi mær órætt, og so krevji eg ikki meir.

M. A. Winther: Eg ma halda tað fram, at eitt sjúkrahús í Vestmanna kann ikki bera seg utan studning frá oðrum kommunum enn Vestmanna. Tað var tí meira hóskandi at spyrja tær nærmastu kommununrnar, um ikki longur enn til Kvívíkar, um tær vilja styðja hesum. Tað vildi eisini verið beint at spyrja í Vágum. Vit hava sæð hvussu sjúkrahús í nógv storri bygdum enn Vestmanna hava haft ringt við at standa seg og ferð eftir ferð hava vent sær til tingið um studning. Vit kunnu ikki nú byggja á tí, sum var ætlað í 1907, tíðirnar eru nú heilt øðvísi enn tá. Vit mega lugsa um vit skulu royna at fáa bygt eitt stórt sjúkrahús ella vit skulu byggja fleiri smá; tí fara vit undir øll hesi smáu, so vil hetta stóra, ið vit hava ætlað her í Havn, kanska standa tómt. Er tað tí hóskandi at arbeiða fyri hesum stóra, táið vit samtíðis arbeiða fyri nógvum smáum, ið kanska vilja forkoma tí stóra? Vestmanna er ikki longur frá Havnini enn til dømis nong plás á Sandoy, og tað verður ikki tverligari at flyta sjúk-

lingar úr Vestmanna til Havnar enn úr Sandoynni til Havnar. Eitt mega vit vita: hvat vit ætla at gera; her má vera system í hjá okkum. Byggja vit sjúkrahús í Vestmanna, so mega vit eisini byggja sovorðin hús á Eiði og á hinum plássunum, hvar læknar eru, táið teir koma og krevja tað. Vit mega fáa greiði á, hvat vit ætla at gera, antin vit skulu byggja eitt stórt og tíðarsvarandi sjúkrahús í Havn ella fleiri smá úti á bygdunum. Eg trúgvi ikki at vit kunnu gera bæði hitt fyrra og hitt seinna so úrslitið verður gott. Spurningurin um hetta stóra sjúkrahúsið var ikki frammi tá, ið seinast var talað um sjúkrahús í Vestmanna. Eg trúdi, at vit vildu bøta um tann ringa standin við hesum ætlaða stóra sjúkrahúsi.

J. Guttesen: Eg gav kanska ikki fullar upplýsingar íáðni og eg skal tí siga nakað aftrat. Tað varð spurt, hví vit ikki høvdu tosað við Kvívikingar um hetta. Sakin er reist frá Kvívik. Táið teir vóru spurdir um hvat teir vildu geva í studning til hitt stóra sjúkhúsið í Havn, spurdu teir okkum, hvat vit ætlaðu at gera í Vestmanna, tí um vit vildu byggja sjúkhús har, hildu teir tað vera høgligari fyri seg, og vildu tí heldur geva studning til tað. Eg gloymdi íáðni at siga, at umframt hvat kommunan vil lata, er í Vestmanna nakað innkomið av peningi privat, eg ætli o. u. 4000 kr. Winther tosaði um, at vit áttu at venda okkum til Vágamenn; til tess havi eg ikki góðar vónir, eftir tí sum vit hava hoyrt frá Vágamonnum her á tingi um læknasakina í Vestmanna og Vágum. Haraftur-ímóti kundu vit spurt í Hvalvík; tann bygdin liggur væl fyri at søkja doktara í Vestmanna, um tað enn er óhøgligt at fáa ringar sjúklingar transporteraðar norður. Vestmanna liggur ikki longur burtur frá Havnini enn Sandoyggin, sigir Winther; ja, men Vestmanne er eitt plass, hvar ið koma nógv skip, og tað er nógv av teirri grund, at vit vilja hava sjúkhús, har er oftast sjúkt fólk frá skipunum í bygdini og tað er ringt at hýsa teimum.

A. Samuelsen: Eg má geva Guttesen rætt í øllum, hann sigir nú, og eg haldi ikki, at tað, M. A. Winther segði, hevir so stórs vekt. Av tí at vit vænta, at Vestmanna altið vil vera eitt plass, hvar ein embætisdoktari situr, so er tað natúrligt, at har verður eitt sjúkhús, líkasum sjúkhús eru í Klaksvík og á Tvøroyri, hvar embætisdoktarar eisini sita. Fyri tað kann tað gott vera eitt meira moderna sjúkhús í Havn. Og har er væl meiningin, at tað skal vera so gott, at vit kunnu fáa serliga góðar doktarar til tað, so fólk har kann fáa specialistbehandling, og at tað ikki skuldi verið neyðugt fyri fólk altíð at fara til Keypmannahavnar at fáa lekidóm. Viðvíkjandi plannunum til sjúkhúsið hava vit planurnar frá 1907. Eg veit, at ministeriið her finnust at nokrum, men tað kann yvirvinnast. Vit vænta, at Kvívik eisini vil stýðja sjúkhúsið í Vestmanna, og eg meini, at vit kunnu gera tað sama nú sum í 1907. Eg trúgvi ikki, at hetta vil forða fyri sjúkhúsi í Havn, so máttu vit av somu grund tikið tilskotið frá sjúkhúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri. Eg haldi tí, at vit eiga at taka væl ímóti hesari sak; um tað kanska ikki kann gerast nakað við hana í ár, so hava vit ofta behandlað sakir í 2 ár. Eg vóni, at vit fáa 13 menn til at stýðja hetta, tað høvdu vit í 1907. Tingmaðurin úr Vágum (R. Niclasen) sigir, at 13 er eitt óheldugt tal, tað er eitt gott tal, og kanska R. Niclasen vil vera uppi ímillum teir 13, hann plagar jú altíð at siga, at hann vil stýðja hvørja góða sak.

S. P. úr Kunoy: Eg havi fingist eitt sindur við læknasakir gjøgnum árini, og eg haldi, at teir ið mæla til hetta sjúkrahúsið í Vestmanna siggja nóg so ljóst uppá bygging av sjúkrahúsum. Eg havi verið í nevndini fyri sjúkrahúsinum í Klaksvík í mong ár, og eg má siga, at driftin altíð hevir givið stórt undirskot, um enn ongantíð so nógv sum nú, og tað sjálvt um tað er ein so stórur landspartur ið søkir sjúkrahúsið sum hálv Eysturoy og allar Norðuroyar. Og nú kemur í ár sunnheitsstýrið og sigir, at hetta sjúkrahúsið, ið hevir kostað okkum so nógv, er aldeilis primitivt, so at síðustykkir ikki finnast í allari Europu utan kanska onkrastaðni á Balkan. Eg má siga tað, at tosa menn á logtingi um skrúuna utan enda, so er eitt sovorðið sjúkrahús ein skrúa utan enda fyri kommununar, tað verður ein skattabyrða ið ongantíð vil minka, men heldur økjast á hvørjum ári, og tað vil eg gera kommunumonnum kunnugt.

M. A. Winther: Eg vil ikki leggja nakað til hindur fyri hesum, tó tað er ikki so at leggja byrður á.

Eg veit ikki um Vestmanna kommuna vil geva nakað tilskot til tað stóra hospitalið. Tað kann væl ikki verða tala um

best at gera eitt sovorðnan »fjalakassa«. Driftin av einum sovorðnum sjúkrahúsi verður forhaldsvís so stór, og eyðvitað er, at tað fæst betri lækni til eitt stórt sjúkrahús fyri allar oyggjarnar enn til tey smáu, so vit mugu hugsa eitt sindur.

R. Rasmussen: Eg siggi hesa sak sum eina princípsak. Tað er ikki júst kostnaðin, eg tali um. Einar 70,000 kr., tað er júst ikki so stórt nú í hesi tíð, men hvat er tað ið gerast skal? Tað er neyðugt, at Vestmanna fær eitt hús til sjúk fólk, tí tað er ikki gott at fáa tey sjúku inn á privat fólk, tað er oftast trupult. Mer. vit mugu gera okkum klárt, hvat vit vilja. Vit vilja ikki hava eitt hús, hvar operatiónir skulu gerast, ella hvar fólk verða løgd inn til langa klinikbehandling. Har ímót eitt hús við nøkrum stovum, hvar nøkur kunna leggjast inn nøkrar dagar, til tey kunna koma undir rætta sjúkrahúsbehandling. Eitt sovorðið hús bleiv ikki so stórt og kostandi sum eitt annað reiðiligt sjúkrahús. Eg haldi tað fast, at hettar er ein kommunalur spurningur. Vestmanna kommuna kann yvirkoma tað sjálv; løgtingið kann ikki taka sær av tí. Og hví skal Vestmanna fáa kæði í posa og í sokk, og Vágar ainki? Tað er líka nær og líka lætt at koma úr Vestmanna til Havnar, sum frá Vágum. Vestmanna kemur nú við andr. um sjúkrahús, Vágar kanska næsta ár. Tá Vágar fáa lækna, vilja teir eisini fáa apotek, og so skal løgtingið styðja tað, og hví lata Vágar vera stjúkbarn? Nei, hettar vil draga nógv eftir sær. Sakin motist til at verða ein kommunal sak, slíkar sakir eigir hvør kommuna at greiða fyri seg. so at slík sjúkrahús ikki koma til at forða fyri tí stóra hospitalinum, ið koma má her í Føroynum. Tað er gott og hent, at slík smá sjúkrahús eru víða hvar í oyggjunum, t. d. tá smittsamar sjúkur koma.

A. Samuelsen: Eg eri glaður yvir, at Guttesen er til steðis og hoyrir. Íkasum í 1907 er man eisini nú beteinkiligur, og tað er sjálvandi, at beteinkiligheitir koma fram, ja vit mugu royna at fáa beteinkiligheitirnar fram. Longu í 1908—09 var spurningurin frammi, um tingið vildi betala undirskot, man helt seg ikki vera føran fyri tað tó viljin var góður. Men tað er betri nú. Vestmanna er eitt ógvuliga heldigt pláss, góð havn við góðum betingilsum fyri stórum trafik, og so er tað Fossá. Fæst tað verkið í lag, vil Vestmanna mennast, ja bygdin er væl monnað. Eg vóni, at tingið vil hjálpa okkum nú, og hjálpir tað nú, so fara vit undir byrðina. Hvat angongur sunnheitsstýrið, sum sigur. at forholdini eru primitiv alla staðni, so ganga vit út frá, at sunnheitsstýrið ikki heldur lovtalur. Tað skal ikki fáa okkum til at falla í fátt. Eg gevi R. Rasmussen rætt í nógvum av tí hann sigur um sjúkstovur, tó haldi eg ikki við honum í og dugi ikki at siggja, at tað bara eru kommunurnar. ið skulu taka tað uppá seg. Eitt annað er: at vit hjálpa kommununum við at halda tað heila gangandi. Vit mugu royna at bøta um sunnheitsforhaldini. R. Rasmussen meinar, at vit ikki eiga at gera nakað í Vestmanna. tí vit oinki gera í Vágum. Vit gera, sum hjartalagið er; komur andragandi úr Vágum, taka vit tað upp. og eg haldi, at vit fara undir sjúkrahús í Vágum, tá lækni er komin og andragandi fyriliggur. Eg hugsi ikki, at kostnaðin verður so stórur. 70,000 kr. er ov nógv, tað er beinast at bíða, um tað kemur so høgt upp. Eg haldi ikki, at vit skulu taka ríkishospitalið (Rigshospitalet) til fyribílæti, tað skulu vit ikki. — Læknar og sunnheitsstýri stilla teirra krav ov høgt. tað er natúrligt, at teir krevja tað besta. men fæst tað ikki. taka vit tað mestbesta ella eitt nummar næst eftir.

R. Rasmussen: Styðja vit eitt sjúkrahús í einum læknadømi, so mugu vit eisini gera tað fyri hini læknadømini. Hvar skulu vit enda. Skulu vit byggja sjúkhús allastaðnis? Um nú fyri at taka til: Sørvingar koma og krevja at fáa sjúkrahús, ella Biggjarmenn ella Slættanesmenn og ikki at siga: Mikinesmenn — vit kunnu tá ikki sýta har um vit játta her.

A. Samuelsen: Eg haldi at R. Rasmusson gongur ov vítt. Tað er ikki so at hvor bygd ella hvor familia fær sjúkrahús. So langt koma vit aldri.

H. C. W.-Tórgarð: Ikki aleina sum limur av tí nevnd, sum situr millum tingseturnar viðvíkjandi hospitali, men eisini sum tingmaður má eg halda við Winther og R. Rasmussen. Eg vil spyrja formannin, um ikki tey svør sum eru komin frá kommununum, kundu gevast tí nevnd uppí hendur sum fær við hetta mál at gera. Eg kann ikki koma burt frá, at tað hevur ómetaligan týdning fyri amtshospitalið, hvussu kommununurnar her stilla seg. A. Samuelsen segði, at hospitalssakin vildi

koma aftur á ting í ár. Hon kemur ikki aftur, tí hon er stedgað. Tað var ífjor samtykt at spyrja Havnar kommunu um hon vildi taka lut í driftini, men Havnar kommuna hevur ikki játtað hesum. Um vit koma inn á tann spurning at ymisk læknadømir skulu fáa sær sjúkrahús, so má sakin koma fraum aftur av nýggjum. Eg havi einki ímóti, at Vestmanna fær sjúkrahús, men eg havi ímóti tí, um tað ger tað, at vit í Føroyum ikki skulu fáa eitt virkiligt sjúkrahús.

S. P. úr Konoy: Eg dugi ikki at skilja fólkatingsmannin. Hann sigir: Lat okkum arbeiða undir teim viðurskiftum, sum her eru fyri hond. Er tað fastsligið av teimum sum duga at skyna á í slíkum søkum at viðurskiftini í Føroyum eru heilt primitiv, so kunnu vit ikki klára okkum. Vit rokna við, at Danmark hevur ein innretning sum nevnist sunnheitsstýri; hendan innretning kunnu vit ikki ganga forbí. Eg seti prís uppá sakkunnleika og teir mugu have grein í sínum máli, tá teir siga, at tað ikki er gott í Føroyum sum tað er.

J. Guttesen: Til Konoy skal eg siga, at forstandarskapið er klárt yvir at her verða útreiðslur, men at vit tó vilja fara undir fyritokuna. Síðani havi og nú hoyrt sagt av tingmanni her at tað pengaliga gekk illa við sjúkrahúsinum í Klaksvík undir krínum av tí, at trolarnir vóru burtur, meðan tað áður gekst væl. Teir nógvu trolarnir, sum nú aftur vilja søkja inn á Vestmanna vilja á sama hátt koma at hjálpa til at halda sjúkrahúsinum uppi har. So meinti R. Rasmussen at um Vestmanna fekk sjúkrahús, so vildu aðrar bygdir koma at krevja tað sama. Eg haldi ikki at hvør einstøk bygd í Vágum vil hava sjúkrahús — og allarminst Sandavágs, sum vil fáa tað so høgligt til sjúkrahúsið í Vestmanna. Vágarnar vilja annars njóta gott yvirhøvur av at sjúkrahús kemur í Vestmanna, tí Vágaskipini liggja jú á Vestmanna.

A. Samuelsen: Konoy fataði ikki meg, tá eg talaði um sunnheitsstýrið. Eg segði tað, at eg forstandi, at sunnheitsstýrið meinti, at sjúkhúsviðurskiftini í Føroyum vóru primitiv. Men skulu vit hugsa um at byggja sjúkhús aðrastaðnis enn í Havn kunnu okkara sjúkhus ikki verða so góð sum tey niðri í Danmark. Vit mugu sláa av í teim krøvum, sum læknarnir krevja. Men tað er alt ov primitivt at sjúklingar, sum fara til doktara, nugu leggja seg inn til privatfólk av tí, at einki sjúkrahús er. Tað kann vera at formaðurin fyri sunnheitsstýrinum ikki hevur gjørt sær hettar klárt. Sjúkhúsið í Havn kann ikki vera nóg mikið fyri allar Føroyar, men tað skal vera eitt nummar betri enn sjúkhúsini á bygd og á annan hátt skal tað so vítt tað kann royna at vera ístaðinfyri Rikshospitalið í Keypmannahavn. Tað er ikki stuttligt at noyðast at fara ta longu ferðina hagar, og mangan fara sjúklingarnir, umframt at teir ofta mugu líða eftir fari, illa av sjóferðini, so at hetta væl viðhvort er atvoldin til at teir ikki kunnu koma seg aftur har niðri. Vit skulu royna at fáa nýtt hospital í Havn og samstundis stýðja sjúkrahús á bygd við tilskoti. Eg havi ongan ótta fyri at vit hvonn dag skulu standa fyri krovum um sjúkrahús; tí tað krevst nógv av teimum sum vilja hava tey. Tað er rætt at sjúkhúsið í Vestmanna eisini hevur týdning fyri Vágar við tað at Vestmanna er skipahavn. Og tað vil hava týdning fyri doktaraspurningin har. Læknarnir seta prís uppá, at sjúkhús er á plássinum, sum teir koma til. Konoy sigir, at man ikki kann láta hánt um sunnheitsstýrið; tað er eisini mín meining. Men eg veit, at eisini læknavitskapurin kann krevja meir enn hann behevir. Sakkunnleiki er góður, men eisini hann skal vera við máta, og við hvørt kann hann koma so hogt upp, at tað er vanskiligt at fylgja honum.

M. J. Winther: Tann fatan sum eg fái av A. Samuelsens forsvari fyri sjúkrahúsi í Vestmanna er at vit fáa sjúkrahús allastaðnis har sum læknar eru. Eitt størri hospital vil tá ikki bera seg. Tað er kanska best so at fara frá at hugsa um hetta stóra sjúkrahúsið og lata Havnarmenn byggja eitt kommunalt hospital og so hjálpa hesum smán plássunum til at fáa minni sjúkrahús. Sýslumaður Samuelsen má duga at skilja, at tað má hava stóran týdning fyri hetta stóra tilgetlaða sjúkrahúsið, at tað fær nógvar sjúklingar. Eg trúgvi ikki, at háðir plánar kunnu gjøgnumforast við góðum úrsliti.

S. P. úr Konoy: Eg skilti Guttesen eins og hana meinti, at sjúkrahúsið í Klaksvík hevði borið seg áðrenn kríggið; ja, men tað hevur verið undir ringum korum; tað hevir millum annað verið soleiðis, at sjúkraplejurskan hevir verið økonoma og hevir haft sjúklingarnar í kost fyri ávísan

pening um dagin, og tað er eingi gott princip. At vit hava haft stóra inntøkn av trolarum har norðuri, viðgangi eg, og tað merkist, at trolararnir ikki eru so mangir nú. Men eg má siga sum áður: havið ikki ov ljósar vónir um driftina. Sýslumaður Samuelsen sigir, at táið sunnheitsstýrið hevir úttalað, at okkara sjúkrahús eru so primitiv, so skal tað vera samanlíknað við dorsk sjúkrahús. Teir hava nú einki sagt til mín beinleiðis, men teir hava sagt til menn, ið eru heilt at líta á, at makan til hesi sjúkrahús vóru ikki at finna utan kanska í teim fátøkstu av Balkanlondunum. Og skulu vit so fara og byggju eitt av sama slagi norðuri í Vestmanna! Tað hevði kortini verið meira at ynskja, at vit í Føroyum fingu sjúkrahús, ið betri svaraðu til navnið. Og táið so hartil kemur, at hesi sjúkrahúsini, sum læknarnir siga eru faktisk ónýtandi, aftrat kosta nógvan pening árliga, so eigur ein at hugsa, áðrenn her verður gjørt nakað. Vit hava har norðuri hjá okkum givið pening í teim seinastu árum til sjúkrahúsins, men skuldi tað verið so gott sum læknarnir krevja, máttu vit lata mangar ferðir 1000 kr. um árið. Umframt hetta koma vit brátt liga til at hava neyðsynjarútreiðslur uppá nógv túsund til sjúkrahúsið fyri at bøta um teir verstu feilir. Allir menn har norðuri takka dr. Bartch fyri, at hann fekk sjúkrahúsið í lag, men tað er vorðið dýrt at halda og enn dýrari at halda tíðarsvarandi.

A. Samuelsen: Eg haldi, at Winther sær nógv ov svart uppá hesa sak, tað sama geldur mínum æraða síðumanni, hrr. Tórgarð. Hvussu stórt hetta sjúkhúsið í Havn er, fekk eg nú at vita frá hrr. Tórgarði, hann segði, at har skulu kunna vera 22 patientar, tað kalla menn her eitt ógviliga stórt sjúkhús. Men sjálvt um vit fáa sjúkhús í Vestmanna, so fáa vit hetta stóraa sjúkhúsið í Havn við 22 patientum fult kortini. Vit skulu hava rontgenapparat í Havn og annað, sum vil gera, at nógvir patientar vilja fara til Havnar heldur, men kortini verður trongd til smærri sjúkhús aðrastaðni, tíverri. Eg haldi fast uppá, at sjúkhús í Havn mega vit royna at fáa sjálvt um vit fáa sjúkhús aðrastaðni. — Síðani segði Konoy, at hesir menn, ið høvdu verið her uppi høvdu sagt, at ongastaðni í tí civiliseraðu verðini vóru makan til hesi sjúkhúsini í Føroyum; eg vil bíða við at trúgva tí, til eg siggi tað svart uppá hvítt frá teimum. Eg havi hoyrt einstaker doktarar siga, at tey tjena einki, men eg siggi eisini, at eingin doktari smæist fyri at krevja fólk inndegd á sjúkhúsini, helst táið persónarnir eru limir av sjúkrakassa. Og dýrt er at vera á teimum, so teir hava nærum sprongt okkum sjúkrakassurnar.

H. C. W.-Tórgarð: Sýslumaður Samuelsen sigir, at eg havi upplýst hann um, at tað stóra sjúkhúsið, sum hann sigir, við trykk á stóra, er ætlað til 22 sjúklingar. Sjálvt um hetta talið ikki er stórt, kann ein kortini kallað tað eitt stórt sjúkhús, tí aftrat hesum kemur karantenu- og epidemihús, og harvið veksur sjúklingatalið til 40, og tað vil utan stóran kostnað kunna umgerast til at vera til 50 sjúklingar. Men umframt, táið sagt verður 22 sjúklingar á einum modernaðum sjúkhúsi, so vil tað siga, at meir enn 50 kunna liggja á tí, utan at tað verður so trongligt sum nú har úti við 16. Eg haldi ikki tað er hóskandi, at fáa nýggj sjúkhús í kommunnum, ið áttu at verið interesseraðar í hesum stóra sjúkhúsi, úrslitið verður hert tað, at vit *fáa* einki reiðiligt sjúkhús í Føroyum.

A. Samuelsen: Tórgarð nevndi, at sjúkhúsið í Havn skuldi vera eisini karantenu- og epedimihús. Eg minnist, at táið talað var um hesar anstaltir og eingin vildi hava teir, fyrisló eg at leggja teir í Vestmanna og so knýta har aftrat eina deild fyri oðrum sjúkum. Eg trúgvi ikki, at Havnarmenn byggja sær hospital sjálvir; vit eiga ikki at krevja so nógv av teimum, sjálvt um teir fáa serliga gott av hesum stóra sjúkhúsi, sum ikki burt Havnarmenn skulu betala, men allir Førovingar. Vestmenningar skulu eisini betala teirra part av sjúkhúsinum í Havn, um teir ikki geva serligan studning, skulu teir tó betala teirra part av tí, amtsrepartitiónsfondurin letur til sjúkhúsið. Eg haldi tað ikki vera ov nógv forlangað at krevja av Vestmenningum, at teir skulu geva studning til sjúkhúsið í Havn, men eg haldi tað vera óbíligt at krevja av teimum fyrst at teir skulu geva studning til Havnar og síðani ikki geva teimum lovvi at byggja sær sjúkhús sjálvir. Eg dugi ikki at siggja, at tað er nakað ilt í, at sjúkrahúsið í Vestmanna kemur áðrenn tað stóra hospitalið í Havn. Byggningurin verður jú stórur, og hann kann økjast, sum fólkatalið veksur, og tað vil vaksa so hvørt sum vit fáa større trafik, havnir o. s. fr. Tá tað verður sagt, at tað eg havi talað fyri sjúkrahúsi í

Vestmanna er ímóti tí stóru hospitalinum í Havn, er tað ikki so.

H. C. H.-Tórgarð: Skal tað verða so, at tað fleiri staðni í Havnar læknadistrikt og í Vestmanna og Sandi til dømis. skal byggjast sjúkrahús, vil Havnin standa seg við at hava sítt egna sjúkrahús.

A. Samuelsen: Sigur man, at tað er aldeilis neyðugt at fáa eitt sjúkrahús, epidemihús o. s. fr. í Havn, má einhvor kommuna verða við. Eg gevi R. Rasmussen rætt í, at 50,000 kr. meir ella minni til amtskommununa ger hvorki frá ella til nú vit hava viðið so djúpt sum vit hava.

M. Samuelsen: Eg vil mæla til, at sjúkrahúsið í Vestmanna fer tað tilskot tí nýtist. Í hvussi er hava vit langt til sjúkrahús í Havn, longri enn til Vestmannar. Eg hugsi ikki, at tað stóra sjúkrahúsið í Havn fellur burtur allíkavæl. Winther segði, at tað førdi til, at sjúkrahús komu alla staðni; men til sjúkrahús krevst lækni. Har distriktslækni er, era betri vónir fyri sjúkrahúsi, enn hvar kommunulækni er.

J. Guttesen: Tórgarð sigur seg at hava tosað við forstandarskapið í Vestmanna og Kvívík um sjúkrahúsið í Havn. Eg segði honum, at eg var sinnaður til at vit góvu tilsagn um tilskot, men at hinir limirnir av forstandarskapinum vóru tað ikki. Hvussu vorðið er í Kvívík, veit eg ikki.

Sakin fór í 5-mannanevnd.

Skrivilsi frá próstinum viðvíkjandi nevndini til útgávu av skúlabókum.

Prósturin: Vit hava áður haft eina skúlabókanevnd, eina 5-mannanevnd. Henda nevndin er nú ikki fullmannað, so hon kann arbeiða. Eg veit ikki rættuliga nær nevndin seinast var vald, men hon var vald soleiðis, at tingið setti ta táverandi skúladirektión sum limir, men sum limir av løgtinginum. Av teim er próstur Petersen deyður, amtmaður Rytter er ikki longur í Føroyum og H. A. Djurhuus ynskir at sleppa burtur úr, so eru bert tveir eftir. Eg vil tí biðja tingið um at fáa nevndina fullskipaða, tí vit treingja til bøkur. Gamlar eru útseldar, og nýggjar mugu fáast, tá tað krevst. Eg veit ikki hvussu nevndin fyrr er vald, fyri fleiri ár ísenn ella á hvørjum ári. Tað er betri, at nevndin ikki verður vald á hvørjum ári. Tað ræður nú um at fáa hana fullmannaða, so hon kann virka.

A. Samuelsen: Eg haldi eisini, at tað er neyðugt, at vit fáa val, men eg havi ikki hug til at velja á hvørjum ári, tað er betri, at nevndin verður vald fyri nokur ár ísenn. Eg meini ikki, at hendu nevndin endiliga skal fylgjast við skúladirektiónini. Eg mæli til, at formaðurin setir val til nevndina á dagsordanin og at so verður valt.

Prósturin: Eg haldi, líkasum Samuelsen, at tað ikki er neyðugt, at sakin fer í nevnd. Vit kunna avgera, um vit vilja hava bókanevndina valda fyri nokur ár.

Formanden: Der er Forslag om, at Sagen overgaar til endelig Behandling.

Hetta varð samtykt.

Fundur tórsdag 7. august.

Frágreiðing frá telefonnevndini.

1. viðgerð.

H. A. Winther: Tað fyriliggja í ár sum onnur ár andragandir bæði nýggj og gomul um boting og útvíðkan av telefonini í Føroyum. Eg skal her greiða eitt sindur frá hvussu tilstanderin er og hvussu vit arbeiða í eygablikkinum. Fyri so vítt er tað ikki neyðugt at greiða frá her hvussu telefonin arboiðir økonomisk: eg kann í hesum vísa til rokuskapin, sum fyriliggur. Tó skal eg nema eitt sindur við tað. Tað eru ikki nógv ár síðani at telefonin arbeiddi við undirskoti enntó hon fekk stóran studning frá tinginum. Tá vit ikki kundu fáa telefonina at bera seg alt hon fekk 10,000 kr. í studning frá økonomisk fond, so mátti onkur feilurin vera. Feilurin var, at telefonin, sum so mong nýggj verk arbeiddi ov trekliga og deils var tað tað at vit vóru nakað rúmskir við at luta gottgerilsi. Tá telefonin byrjaði var talað

um man skuldi gottgøa støðunum nakað ella um man skuldi siga at tann sum vil hava telefonstøðu á sínum plássi eisini má gjalda tær útreiðslur sum har av standa. Vit góvu teimum so 3 oyrur fyri hvørja samtalu. Hetta skuldi standa inntil víðari við tað at mann moguligt seinni kundi taka hendan studningin aftur. Og studningurin varð tikin aftur. Og tað var rætt; tí vit máttu royna eftir at telefonin skuldi koma til at bera seg. Viðvíkjandi at hæðka takstirnar, so hevur mótvilji verið hvørja ferð hesin spurningur er fyrikomin her og mest, tá talan hevur verið um at frátaka støðunum gottgerilsi. Men eg haldi tað var rætt at man fekk telefonverkið at balancera. Men vit eru enn ikki kommin stórt víðari enn at tað balancerar. Verkið stendur í $^1/_2$ mill. kr. og yvirskotið er ikki meir enn 10,000 kr. Her er lítið til rentur. Kanska tað tó dreyar seg um 20,000 kr. alt í alt. Hin 1. oktober ífjør átti telefonvesinið ein peningabeholdning av 31,000 kr. og kanske vit nú, tá vit koma til hetta roknskapsárið, standa við 40,000 kr. Man vil altso síggja, at tað nú gongur soleiðis við telefonini, at vit arbeiða við nokk so góðum yvirskoti. Og hetta var tað endamál, eg havi sett mær: at telefonverkið skuldi bera seg sjálvt. Man hevur viljað líkna sanatoriið og telefonverkið saman. Tað kann ikki gerast; tað kann ikki leggjast tað sama til grund fyri bæði. Viðvíkjandi samtalstakstunum, so haldi eg at tær eru ov lágar, ikki minst í forhold til tær inntøkur fólk hava nú um stundir. Fólk spyr ikki eingang nú eftir, hvat samtalurnar kosta og tey gjalda heldur tað meira sum ein bráðsamtala kostar enn at sita og bíða. Tað er tí natúrligt at hugsa um at hæðka takstirnar og eisini takstirnar fyri abonnentarnar. Her í Havn eru nú um 100 abonnentar, og teir hava nógv gott av telefonini. Nú kann maður í sínum kantóri fáa fatur á hvønn tann í staðnum sum hevur nakra fyritøku í gongd. Í 1907 var ætlan at seta abonnementsafgiftina til 80 kr.; men tað varð ikki gjørt, tí vit hildu, at tað var nakað nógv, tí telefonin var tá so nýggj, og teir menn sum tá teknaðu abonnement ikki vildu fáa so nógvar bohagiligheitir av tí sum teir fáa nú, tí tað vardi nakað leingi áðrenn almindiligir forrætningsmenn í Havn tóku til at fáa sær telefon, meðan nú begeringarnir eru so nógvir at vit ikki kunnu koma teimum til møtis. Og heldur ikki hava vit nú heft tilfar, tó nú er betri. Er abonnenturin komin í samband við telefonnetið, so gevur hann okkum eitt árligt peningabeløp, sum vit ikki hava nakrar útreiðslur við; her fáa vit nakað sikkurt, nakað stabilt. Í avsluttandi roknskapsárið var abonnements peningurin 10 -12,000 kr.

Vit høvdu ikki arbeitt so væl sum vit hava við telefonini, um vit ikki høvdu haft abonnementsavgiftina og fingið fleiri abonnentar. Tað hevir oftast verið mótvilji her á tingi, tí Havnin ikki letur nóg mikið til driftina av støðuni í Havn, eftir hvat ið mongum bygdamonnum tykir. Eg má siga, at eg meini, at Havnin má lata studning til støðuna, men vit mugu lata okkara stóra part, tí tað hevir týdning fyri alt landið, at støðan í Havn er so góð sum møguligt, ikki bert hvat ið betjening viðvíkir, men eisini hvat ið roknskapi viðvíkir; tí í hesari, eg kann gott siga milliónfyritøku, ræður tað um at hava tað best møgiliga leiðilsi í administrationini. — Táið vit byrjaðu við telefonini, fingu vit okkum eitt skiftuborð í Havn til 100 abonnentar; teir eru nú komnir upp um tað talið, og vit hava verið noydd at seta upp enn eitt skiftuborð til 16 abonnentar. Hetta er kortini bert bráfengis, og nú mega vit hugsa um, hvat vit skula gera, antin fáa okkum eitt nýtt skiftuborð til uppaftur 100 abonnentar í Havn, ella kanska fáa okkum har eitt borð til 200 abonnentar, og so senda tað gamla borðið í Havn til Tvøroyrar, tað er jú tann næststørsta støðan, og senda borðið har til onkra aðra stoðu, har tað nýtist. Ein annar spurningur, ið vit mega taka støðu til, er um telefonhúsið í Havn. Vit bygdu tað við lítlum framskygni og nú er tað nógv ovlítið, har er ov lítil betjening, ov fáar boxir, ov lítið kantórpláss. Tað má vera so fyriskipað, at nakrar damur eru á kantórinum bert, aðrar við betjeningina, ikki soleiðis sum nú, hvar tær skifta ímillum. Hatta má gevast driftsnevndini upp í hendi at avgera. Eg dugi ikki at síggja annað enn, at vit noydast at byggja aftrat, og vit mega byggja so stórt, at í húsinum verða húsrum til driftsstýraran, hann kann so geva hóskandi leigu. Nú er kanska ring tíð at byggja í, men eg má biðja tingmenn hugsa um hetta. — So er enn eitt mál, ið vit noydast at taka støða til, nevniliga um driftsstýraran. Er tað nakað, ið um ræður, so er tað, at driftsstýrarin er ein maður, ið bæði er væl kenur í driftini teknisk sæð og eisini er førur fyri at halda góðan roknskap. Vit hava í mong ár haft tann sama

mann sum driftsstýrara, hrr. ingenior Jacobsen, og eg má taka mær loyvi at siga her, at hann hevir verið ein sera dugandi maður, og at hann hevir gjørt eitt ógviliga stórt og gott arboiði. Hann hevir í mong ár sokt um meiri løn, og tað má sigast, at tann lønin, ið hann var antikin fyri, nú er nógv ov lítil, eftir tí virði, sum peningur nú hevir. Tingið má umráðast væl áðrenn tað letur henda mann fara frá okkum. Eg havi tonkt mær ein útveg: um vit ikki, so leingi vit hava bert ein ingenior í Foroyum, kundu løna honum eitt sindur orðvísi enn nú. Tað vil jú óivað koma til tess, at vit fáa nýtslu fyri fleiri ingeniørum heruppi, ein til telefonina, ein til vegir, ein til elektricitetsverk kanska, men so leingi vit bert hava ein, kundu vit gjørt soleiðis, at hann fekk somu løn fyri sítt arbeiði fyri telefonina sum nú, men at vit umframt góvu honum einar 2—3000 kr. fyri at hava yvirsjón við vegabygging, og at hann fekk pensiónsrætt av hesum peningi eins væl og hann fær av lønini sum driftstýrari. No, ætli eg, at vit kundu fingið henda mann, ið vit hava nú, at verða hjá okkum. Vit kunnu geva honum so stóra løn, at honum ikki nýtist nakra ekstralon fyri tað arbeiði, hann kemur at gera fyri amtið. Hesin spurningurin um driftsstýraran má loysast. Tað er sagt, at hann nýtist ikki at vera ingenior, ja, men tað má vera ein dugandi maður, ið verður lontur væl fyri sítt arbeið. Tað sæst best nú, driftsstýrarin er burtur, hvat arbeiði hann hevir gjørt á kantórinum, umframt alt annað arbeiði; roknskapurin er komin so mikið í afturhond, tí vit ikki hava haft menn at seta í staðin, ið hava verið heilt inni í hesum arbeiði. Driftsstýrarin hevir biðið um at sleppa frá telefonverkinum utan uppsigilsi. Vit hava svarað, at vit vilja lata løgtingið avgera hetta. Hann hevir 6 mánaða uppsigilsi. Sleppa vit honum nú, standa vit utan nakran mann, ið er førur fyri at taka roknskapin. So hevir hann í brævi og telegrammi biðið um at fáa ferina longda til nitt í septembir. Hann hevir ikki haft feriu í 8 ár, so hann kundi væl haft loyvi til nú at fingið eina góða hvíld, men vit máttu svara nei, tí vit trongja so harðliga til hansara. Um maðurin vil verða hjá okkum, táið hann fær hægri løn, veit eg ikki reiðiliga at siga frá, men av einum privatum brævi kann eg siggja, at hann er ikki heilt óviljandi til tess. Enn er eitt ið ger, at vit eiga at hekka lønina. Tí um hesin maður fer burtur hiðani og vit ongan ingenior hava í Foroyum, vil ríkisstýrið óivað krevja av okkum, at vit halda ingenior her á landi at hyggja eftir vega bygging, ið skal gerast her í næstu framtíð við statsstudningi, og tað kann ikki sigast annað, enn at ingenior Jacobsen hevir verið ein dugandi vegingeniorur og hampiligur yvirmaður við vegarbeiðinum.

Tað er so, at telefonin kundi givið honum hægri løn, men eg havi óttа fyri at leggja ovnógv á telefonina. Ingeniørurin ger nógv arbeiði á annan hátt, han eigir tí at lonast fyri tað og lonast væl, men ikki bara av telefonini, eg gangi ikki við til at skorja telefontokurnar fyri aðrar kassars skuld.

So er ein spurningur, sum hevur ligið frammi í fleiri ár, at fáa telefon til fleiri pláss. Her hava vit eitt forpliktilsi, men tað hevur ikki verið uppfyllt, tí vit kunnu ikki ímøtikoma ollum ynskjum. Vit hava sæð, at tað tørvar, mong pláss eru illa stødd, men tey eru so óhøglig, t. d. Svínoy, Fugloy, Skúoy o. s. fr. hvar ringt er at koma til, at tað vit ikki betala seg at leggja telefon, útreiðslurnar vilja altið verða hægri enn inntøkurnar. Men harfyri tørvar hesum plássum ikki minni enn mongum øðrum at fáa telefon. Vit mugu vera klárir yvir tað í tinginum, at fyri at fáa tað til at svara rokning, mugu vit lata t. d. tokstirnar hækkast. Ein orsøk til, at tað illa vil løna seg við hesum smáu plássum, er, at har eru eingir sjálvstendigir forrætningsmenn. Nú kann ein siga, at tað er so av tí, at teir eru avstongdir frá at verða tað, vegna tað ringa sambandið, og at tað vildi hjálpa, fingu teir telefon. Eg kviði fyri, at tað vil koma í lag, men vit kunna altið hava eitt yvirlit. Vit skulu royna, at verkið skal svara seg. Táið nú spurningurin aftur liggur frammi vil og siga, at eg haldi tað vera forhastað at gera nakað í ár, tí alt er so dýrt, lønir, tilfar, fraktir o. a. um alt annað kann hugsast at koma til at falla nakað, vilja lønir ikki lækkast. Tað var tí betri at stødga eini tvey ár enn, kanska bíligari tíðir koma, og so samlar telefonin sær meiri pening til at tera uppá. Eg vil tí biðja tingið ikki gera ov nogv av einum. Skulu vit hugsa um at leggja telefon til allar bygdir, sum onga hava verður tað ovdýrt. Eysturoyin hevur fingið væl nógv, tó eg unni henni tað, men skulu allar hesar bygdir fáa telefon, vilja útreiðslurnar duplast manga ferðir. — Vit standa nú úti fyri øðrum útreiðslum, mugu fáa verkið betri, fleiri leidningar mugu leggjast. Tað

er ov mikið trupult við at fáa tosað, tað kann vara næstan ein heilan mánað at fáa eina samrøðu t. d. millum Skarvanes og Viðareiði. At dupla linjurnar lønar seg væl, tí fólk tíma ikki at bíða, tí at tey sleppa ikki fram at, og tí mugu vit fáa meiri tráð. Nú standa intøkurnar ikki í forhold til økingina, tí at samtalurnar verða ikki so nógvar, sum tær kundu verið, ikki eingong smærsamtalur koma fram.

Eg havi nú tosað tað mesta sum eg vildi, og vildi tí, at hettar skuldi betraktast sum fyrsta viðgerð av teimi fyriliggjandi søkum og mæli til, at tær fara í eina 5-mannanevnd.

Formaðurin las upp bonarbrovini. sum utan innsigilsi betr. fyri at vera havd til fyrstu viðgerð.

J. Patursson: Eg vil siga nokur fá orð um tað brævv eg havi lagt inn um at fáa samband millum útoyar og meginoyar. Ætlan var í fyrstani, at vit skjótt, tá vit fingu telefon (máltráð) skuldu knýta saman tær smáu oyar við tær stóru. Tað eydnaðist ikki, og eg vil ikki her tosa um hví. Nú er so nógv umliðið, at tað vildi verið hent, at tingið fekk at vita, hvat tað vildi kosta at byggja og hvat umsitingin av einum sovorðnum máltráð sambandi vildi kosta, og hvussu tað lovsir seg at fáa sambandið í lag. Eg haldi, at vit mugu fáa ein kønan mann uttanífrá til at gera eina slíka ransókn, tí hendu ransókn krevur serligt hegni til at ætla um útseting av kaðlum. Sokja vit eitt utanfyri Førovar, vil tað sjálvsagt kosta nakrar túsund krónur. Eg haldi at vit nakað skjótt eiga at fáa hetta í lag.

O. Effersøe: Jeg synes, at det vilde have været rigtigere, at der havde foreligget en trykt Beretning fra Udvalget i Stedet for den skrevne. Vi har tidligere faaet trykt Beretning. Jeg er tilfreds med, at Winther har udtalt, at Telefonvæsenet staar saa godt, og med, at det under det Flertal, som i en Del Aar indtil i Fjor har siddet i Tinget, er kommen saa godt fremad. Dette skyldes for en væsentlig Del, at vi, i sin Tid fik Halvdelen af Anlægsudgifterne som Tilskud fra Statskassen, og dette kan vi ogsaa i Fremtiden regne med. Jeg er glad ved, at Telefonen staar godt økonomisk, og vil bestræbe mig for, at Telefonvæsenet skal svare Regning. Det er godt, om det kan ske; men vi maa ogsaa tage Hensyn til, at Telefonen kommer saa mange paa Færøerne til gode som muligt. Det er Hovedopgaven. Jeg vil anbefale, at man med Hensyn til Andragender om Nyanlæg viser Forsigtighed, og særlig, at man vel overvejer saadanne nye Anlæg, hvis Vedligeholdelse koster meget. I de senere Aar har det været stille med Hensyn til nye Anlæg paa Grund af Mangel paa Materiel; det er derfor naturligt, at man nu, da Materiel kan faas, tager fat, først og fremmest ved Forbedring af Anlæggene ved Dubleringer af Linierne. Jeg vil her fremhæve de Udvidelser, som man trænger til paa Suderø. Det bliver netop saadanne, som ikke bliver kostbare, hverken i Anlæg eller i Vedligeholdelsen, nemlig lette Landlinier. Det var meppe rigtigt, hvad Winther sagde, at man ikke kunde sammenligne Telefonen med Sanatoriet. Begge er indrettede for almene Formaals Skyld. Det bliver nødvendigt at foretage visse Forhøjelser af Taksterne. Dette vil ikke være urimeligt, da Pengene nu har faaet mindre Værdi, men Taksterne maa ikke sættes saa højt, at Telefonen bliver mindre benyttet. Ogsaa Abonnementstaksterne bør sættes op. Jeg vil henstille, at man sætter Taksterne op i Forhold til, hvor mange Abonnenter der er paa hvert Sted. Man kunde f. Eks. sætte en Takst pr. Telefon, hvor der er 50 Abonnenter, og en noget højere Takst, hvor der er 75, samt igen noget højere, hvor Abonnementtallet er 100, eller noget lignende. Men skal man ind paa denne Fremgangsmaade, maa man yde passende Tilskud til Stationer, hvor der er betydelig Trafik. Derved aflastes ingen Byrde for vedkommende Kommune. — Der blev fremdraget Spørgsmaal om Driftsbestyreren. Mit Syn her stemmer med Winthers. Vi kan ikke undvære en Driftsbestyrer, som er Ingeniør. Denne kan ogsaa benyttes til Tilsyn af vore Veje. Om vi faar en Mand, som ikke er Ingeniør, saa gaar det ikke, da Staten vil kræve for sit Tilskud, at Manden er Ingeniør. Driftsbestyreren bliver ellers meget benyttet til det regnskabsmæssige. Kunde man ikke aflaste ham en Del herfor?. Men dette er et Spørgsmaal, som Telefonudvalget nok vil beskæftige sig med. Jeg mener, at Telefonbygningen i Thorshavn er opført med rigtigt Fremsyn. Man har nemlig ordnet sig saa, at den kan udvides, at der kan opføres Tilbygning. Jeg vil lægge et godt Ord ind for de Arbejder, som der har været Tale om paa Suderø; men nu er der vel ikke længer noget i Vejen for

disse. Det er nu først Linien Tvøra - Vaag.

R. Rasmussen: Eftir sum eg havi verið og ført eitt tilsýn við telefonverkið, meðan telefonstýrarin var burtur, vil eg siga nøkur orð. Eg havi í hesar 3 mánaðir fingið nakrar erfaringar, men tær hera ikki allar í tað borð at man kann vera absolutt glaður. Tað verður klagað av fólki og av bygdastøðunum hvør móti aðrari um nýtingina av telefonini. Sjálvsagt er okkurt í tí, og so ræður um at finna orsakan, tí tað er ikki sunt, at tað verður jamrað alt ov nógv. Linjurnar eru so fáar og telefonin verður so mikið nýtt, at tað er ringt, at sleppa fram við samtalunum. So koma bráðsamtalurnar og slá aðrar samtalur av eins sum trumbur í kortspæli. Nú kann sigast at hetta er vinningur fyri telefonina, tí at hesar samtalur kosta 3 ferðir so nógv. Men í samfundsfyritøkum eiga vit ikki einans at síggja uppá peningin, men eisini uppá hvat sum er demokratisk rætt. Tað er ikki beint at hann, íð hevur nóg mikið av peningi skal kunna slá annan mann burt frá telefonini. Eg vil framføra her at bráðsamtalur verða avskaffaðar og at tað verður ein samtala fyri allar. Hesar kunna vit seta eitt sindur upp, so at telefonin ikki tapir við hendan ordningin. Soleiðis gera teir í londum sum eru meiri demokratisk enn hjá okkum. Harnæst er talað um at byggja aftrat telefonstoðuni her. Tað er neyðugt at umordna og at byggja aftrat. Tí tað er heilt skoivt at tað rúm, sum fólk situr og betjenar telefonina í, er opið til tað rúm, hvar fólk renna út og inn. Har er heldur einki serligt stað, hvar man kann móttaka og avsenda telefontelegramm, utan at tey so at siga skulu fara fyri hvønn mann. Sjálvandi er boks, men har er ikki frítt fyri at hoyrast út úr. Eisini er har eitt verilsi, meu har sita fólk og arbeiða. So er ein telefon á verkstaðinum og hjá bestýraranum, men neyðugt vil man fara har. Rúmið í telefonhúsinum er nógv ov lítið, serliga um vit skulu hava eitt skiftuborð til 200 linjur, verður tað ómøguligt at hava tað inni. Tann eini veggurin, har snarljósisavleiðararnir standa, er heilt fullur, og vit skula til at taka ein annan undir nýtslu. Tað hevði kanska verið tað besta at byggja so stórt, at driftsstýrarin kann búgva í sjálvum telefonhúsinum, sjálvandi má so ásetast ein hóskandi leiga. Sýslumaður Effersøe segði, at vit til driftsstýrara absolut eiga at hava ein ingenior. Ja, tað er tað besta, at hann er ingenior, men ikki nokk. Tí har skuldi við einari so stórari fyritøku verið ford ein fult út greið bókførðsla, eitt bókhaldari, sum var skiligt ikki bert fyri honum sum førir tað men eisini fyri hvønn rokskapskonan mann; mánaðarrokskapurin er góður, men hann gevur ikki nógmikið, táið talan er um eina slíka stórfyritøku. Ein so stórur rokskapur er neskað nógv at krevja av einum ingenieri. íð hevir nógv annað um at vera við tað, at hann eisini skal gera arbeiði sum vegingeniorur og tá kanska verður burtur einar 14 dagar ísenn. Eg haldi, at vit skuhi hava ein ingenior, men vit mega bestemt eisini hava ein bókhaldara. Vit mega eisini skilja ímillum betjening av telefonini og kantórarbeiði: at hava tey saman sum nú, førir til, at hvorki verður so gott sum tað átti at verið. Skilja vit tey hvort frá øðrum, vilja vit óivað uppnáa ógviliga nógv til at minka um klagurnar yvir telefonina. Latum okkum hugsa um hetta, táið ein nevnd verður sett til at arbeiða við hesum máli undir tingsetuni. Hetta vil alt kosta nógvan pening, men hesin spurningur er so umráðandi, at vit mega gera nakað fyri at fáa eitt gott skil á hesum.

A. Samuelsen: Tað plagar at vera alminduligt, at teir einstoku tingmenn útsøla seg ógviliga útlorliga um hesa sak og serliga bera fram vaski um útvíðilsi av telefonini. Eg skal fyri mín part siga, at eg vil fegin vera við til at gera tað arbeiði, íð eftir er, til telefonin er fullkomin her í Føroyum, men eg trúgvi, at vit kunnu ikki gera alt ísenn, og eg haldi, at vit eiga at gera, sum ætlað var í 1915, at fáa ein plan yvir hvat vit skulu gera, numerera anleggini og byggja tey har eftir. Tað er ein løgtingssamtykt at leggja telefon til Svínoyar, men onn er einki gjørt av tí at viðurskiftini ikki hava verið til tess undir krígnum; eg vóni tó, at hetta kemur skjótt til útførilsi. Í Eysturoynni ynskja vit telefon til Rituvíkar, Lamba og einstok onnur pláss, tað vóni eg verður gjørt so skjótt tað kann. Tað er so, at ynskini um at fáa telefon eru mong enn, og eitt gott yvirlit yvir hvussu vítt tað kann ganga, kunnu vit fáa úr løgtingstíðindi frá 1915, hvar næstan hvør einasti tingmaður kom fram við bøn um telefon til ynsar bygdir og tað var so nógv, at tingmenn sjálvir óttaðust, og kom uppskot frá 15 tingmonnum um at kvæla sakina; nú

vóni eg, hon kann koma fram aftur. Táið talað verður um hækking av samtalugjaldinum, má eg siga, at eg skilji væl, at øll pláss, ið ikki hava telefon, siga, at tað er meiningsleyst, at teir onga telefon hava og at hinir, ið hava hana, skulu hava hana so bíligа, at tað einki verður til avlops, so nýggjar telefonir kunnu leggjast. Tað kann telefonerast rættiliga langt fyri 30 oyr, og 30 oyr nú er ikki meira enn 10 oyr fyrr. Tað sæst eisini at snarsamtalurnar eru so ógviliga nógvar, tað kundi týtt uppá, at tað hevði borið væl til at hækka samtalugjaldið, og tað kundi ti verið gott at vita, hvussu nógvar snarsamtalurnar eru samanlíknaðar við hinar. Tað kann kortini koma aðrar tíðir, tá pengarnir ikki vera so ríkiligir sum nú, og tá vilja væl snarsamtalurnar minka. Men eg meini kortini, at tað er eitt spursmál, um vit ikki skula fara til eina moderata hækking av takstunum. Roknskapurin vísir eitt yvirskot uppá umtrent 20,000 kr.; tað er eitt sindur, men ikki so ógviliga nógv, tí vit fingu jú stórt statstílskot til anleggið, og av tí rokna vit ikki rentu, við tað at vit fingu tann kapitalin til gávu. — Tað ræður nógv um at dublera sumar av linjunum, vit líða nógv undir hesum eisini í Eysturoynni, sjálvt um tað ikki er so ringt har sum í Sandoynni, eftir hvat ið ørføraríin segði frá; eg hávi kortini verið so illa staddur í Eysturoynni, at eg ikki kann hava fingið samtalu sama dag við eina bygd á sonn oyggj, og tað er heldur nógv at lata sær bjóða. Hetta kann ikki vera í longdini, at telefonin ikki skal gera fulla nyttu, har sum hon liggur, so einki annað er at gera enn at dublera tær viktugastu liniur. Mær kemur tað soleiðis fyri, at mangar staðni ræður tað bara um, at kunna ekspedera samtalur; vit missa nógvar inntøkur av tí at fólk ikki kann koma framat, og tað kan vera, at táið vit kunnu ekspedera allar samtalur, at vit so fáa so stórar inntøkur, at vit kunnu útvikla anleggið. Um driftsstýraran vil eg siga, at ífjør noktaðu vit at hækka løn hansara, tí vit visto, at hann tað árið hevði fingið stóra ekstra løn fyri arbeiði fyri amtið. Hann hevði tá javnt við amtmansløn. Vit meta hann javnt við embætismenn okkara til løn, og hvat hann krevur út yvir tað er ræf det onde. Tað hevði verið gott, um vit høvdu ein mann, ið vit kundu, um eg so má siga, sett við sum driftsbestýrara; eg meini, um vit høvdu ein ið kundi fingið útdannilsi soleiðis, at vit høvdu meira enn ein mann at taka tál. Tingið kundi kanska stvðja einum manni, ið kundi farið til Keypmannahavnar á eitt telefonkantór ella líknandi og har fingið sær kunnleika. Vit kunnu lætt koma í forlevinheit við bert at hava ein; hann kann verða sjúkur ella siga seg frá og fáa sær annað at gera, hann kann rýma burtur ella hann kundi blivið so grovur í sínum krøvum o. s. fr. Vit hava ein flinkan mann við telefon kontórið, tó eg veit ikki, um hann kann verða driftsstýrari, nei, tað beinasta er, at vit seta ein driftsstýrara við. Húsið hevði eg ikki vænta skuldi verða ov lítið, er tað neyðugt at byggja enn? — Vil Havnar kommunа, líkasum bygdirnar byggja og halda statión, kunna vit jú bjálpa henni við tilskoti. Ørføraríin segði, at tað ikki var víst nóg stórt útsýn í hesi sak, eg meini ikki vit gjordu so, vit sýndu júst útsýn, tí vit keyptu stykkið, hvarvið møguligheitir eru fyri útvíðilsi. Spurningurín má umhugsast og telefonútvalgið koma við uppskoti. Tað verður klagað frá bygdunum yvir tað nógva arbeiði sum gjørt verður fyri lítið og einki við umstillingar o. s. Kann einki gerast við tað? Tað er jú eitt stórt arbeiði, statiónirnar hava fyri tað almeina besta. Kann man ikki geva teim eitt gratiale? Eg vil leggja eitt gott orð inn fyri tær statiónirnar, ið hava nógvar umstillingar, tær eru jú so at siga centralir. Nevndin veit, hvørjar statiónir ið hava tað ringast í so máta. — Effersøe brúkti vendingin: telefonirnar áttu at svara seg. Statsmyndigheitir roknaðu við, at vit skuldu hava pláss, sum ikki kundi svara seg, tí eitt verk, sum kann betala seg, eigur ikki at hava offentligt tilskot. Tí at vit hava fingið so stóran statsstuðning, haldi eg fram, at vit skulu taka tey plássini við, sum ikki lona seg, tað er eitt forpliktilsi vit hava. Eg vil enda við hesum. Sukin skal í nevnd, so fáa vit ein betonkning, og tað vilja eisini koma endringsforslag. Tað er so enn, at alt er nakað dýrt, men nær kunna vit rukna við prísum, sum fyrr, nei, tað kann ikki nytta at bíða til vit fáa normalar prísir, vit mugu gera tað nú.

J. M. Matras: Tað er nógv tosað nú, og tað eg vildi føra fram, er mestapartin komið frá øðrum, og eg vil tí ikki gera langt av. Frá tí kreds, eg representeri, eru nógv andragandir inni, og eg anbefali tey í fyrstu rekkju. Soleiðis telefon til Svínoyar, har skuldi verið luftleidningur og ikki

kaðal. Eg veit ikki, um ransóknir eru gjørdar angangandi botn og streym. At byggja hinar linjurnar er ikki langt og torfort. Vit hava yvirslag frá fyrr yvir, hvat tað tá vildi kosta. So er tað frá Mikladali, ikki frá Húsum, sum fyrr hevur haft telefon, men ikki nú. Tó, kemur telefon til Mikladals, kemur hon vel at á Húsum. So frá Trollanesi við nógvum undirskrivarum; eg vil tilmæla tað, tí har býr fólkið so avsiðis, og tað hevur neyðugt at fáa nakað gott at frætta. So er tað Múli. Teir vuskja sær ein stubba frá Kvannasundi; tað er ikki sjáldan, at teir mugu seta upp í ringum veðri, tá var tað gott fyri teir at fáa boð frá sær, so tey heima ikki verða bangin um teir. Eg vil mæla til, at tingið lugsar um teir. Fordupling er neyðturvulig fyri okkum, vit hava ringt við at fáa samband við Havnina, vit sleppa sjáldan longu enn til Klaksvíkar við telefonsamroðu. Tað er bert einkult linia úr Lorvík, tað hindrar at sleppa longur fram t. d. til Fuglafjarðar, entá við silsamtalur. Tað gevur nógvan pening at brúka sílo, men tað hevur sína ringu síður, tað kostar nógv fyri tey, ið skulu tosa, og so er tað ikki sjáldan, at tað er torfort at sleppa framat allíkavæl. Fyra at koma teim ímoti, ið vilja hava telefonsambandið betri, vil eg ganga við til at hæðka takstirnar. Skulu vit bíða til tann bíligi prisurin kemur, er ov leingi bíða.

M. Samuelsen: Eg havi ikki annað at siga enn tað, at eg haldi at tað er neyðugt at viðka telefonina, og um tað kann lata seg gera vil eg ganga við til at hæðka telefontakstirnar. Utoyggjarnar hava verið alt ov leingi utan telefonsamband.

J. Rasmussen: Eg haldi at mann er noyddur at hæðka takstirnar og kanska eisini søkja um stuðning frá statinum. Tað eru nógv pláss enn sum eru fyri utan telefon, soleiðis er hjá okkum Sløttanes, Gásadal og Mikines fyri utan telefon. Mikines er eitt pláss, sum má koma í fyrstu rekkju; har búgva 200 menniskjur. Vit mugu hæðka takstirnar og eisini søkja statsstudning til kaðlar. Eg vil mæla nevndini til at lata Mikines fyrst og fremst fáa samband við telefonina.

M. A. Winther: Eg vil til sísta roðaran siga, at hann skal ikki verða bilsin um vit ikki í stundini leggja telefon til Mikinesar, tí vit eru illa royndir av kaðlunum. Tað er lítil vón um at kaðal kann liggja í Mikinesfjørði, so streymhart og so nógvar grynnur har eru. Og at bøta kaðlar aftur í Mikinesfjørði verður vist eitt ringt arbeiði. Men eg vænti seinni uppá eina betri loysning til at fáa Mikines í telefonsamband á øðrum veg enn við kaðlum. Tá tað ikki er gjørt nakað við Svínoy, so er tað tí at tað hevur víst seg at tað er lítið gjørligt eftir so longum veg at fáa samband við luftleiðing, tí lufttræðirnir halda ikki. Teir klaka og so slitna teir. Tað hevur jú verið roynt við Húsum, men tað bar ikki til, og at tað skuldi borið betri til nú sambandið er komið í minnital, trúgvi eg ikki. Mær dámar ikki lovsangin frá Ellersoe um sambandsmenn og telefonina. Eg vil siga, at eisini eg havi gjørt mítt til at halda hetta verk í góðum skili. Eg unni bæði Mikinesi, Skúoy, Svínoy og Fugloy at fáa telefon, men tað er í stundini næstan ógjørligt. Og nógv av hinum plássunum eru smápláss, sum lítið vilja geva av samtalum, so at tað er ikki so undarligt at vit ikki hava hjálpt teimum fyrr. Nólsoy er nær hendis og hagar er kanske ikki so ringt at leggja telefon. Eg trúgvi tó ikki at vit kunnu ímotikoma yuskir frá hesum oyggjum, ikki við kaðlunum, við teimum peningum, vit hava. Tað kundi verið at umhugsa um vit ikki skulu geva umstillingstoðunum nakað aftrat. tí tær gera eitt arbeiði fyri heila telefonverkið. Annars haldi eg at vit fara at teinkja um viðkan av telefonini; men eg vænti ikki, at vit kunnu geva Mikinesi telefon.

J. Rasmussen: Altíð tá talan er um Mikinesfjørð verður hann betraktaður sum eitt óhýri. Og soleiðis hevur Winther betrakta hann í dag. Eg trúgvi ikki at Mikinesfjørður er ólíkur øðrum fjørðum. Ein samanpentaður kaðal liggur yvir í oynna sum Winther er frá og hann heldur. Vit skylda Mikinesmonnum at teir fáa telefon.

O. Ellersoe: Winther synes ikke om mine Udtalelser om, at Telefonvæsenet under det tidligere Flertal i Tinget havde staaet godt økonomisk. Det var imidlertid en Kendsgerning, jeg fremførte. Han er ikke berettiget til at slutte, at jeg har villet udtale, at han skulde have hindret Telefonværkets gode Gang. Jeg kan sige, at Winther har gjort sit til Gavn for dette. Hvad angaar det, som R. Rasmussen udtalte om Telefonstationen i Thorshavn,

da er dette et Spørgsmaal, som nærmere maa undersoges i Udvalget. Jeg kan ikke rigtig forstaa hans Tale om Telegrammerne. Telegrammer indleveres tilTelegrafstationen. Telefontelegrammer indleveres skriftlig. Selve Telefonstationen her er indrettet som de Telefonstationer nede i Danmark, jeg har set.

J. J. Weihe: Tað er áttalað ynski frá ymsum síðum um at víðka telefonina, og tí vil eg eisini føra fram at tað eru komnir umsøkningar um at fáa telefon frá tveimum bygdum: Svínáum og Oyrar í mínum valgdømi: tað vil eg biðja nevndina hava í hugo.

Samtykt varð at beina sakina í ō mannanevnd.

Uppskot um tinglund við hr. Blauw, verkfrøðing.

J. Patursson: Tað hevði verið gott, um tingið kundi hava fund við hr. Blauw til samrøðu um ta sak, sum hann er komin til at hjálpa okkum við. Hesin maður hevur eisini tí verri vetið áti fyri Ijótum officiellum álopum frá »Dimmalætting« og átti at fáa loyvi til at forsvara seg. Nógv fólk hava eisini stóran hug fyri hesum máli og vilja fegin hoyra frágreiðing frá hesum verkfrøðinginum.

Formaðurin: Jeg beder Patursson forklare, hvad han mener med, at Ingeniør Blauw er bleven officielt angreben.

Patursson: Ig havi nýtt orðið »officielt« galið, og meinti »offentliga«; hann er offentliga ánklagaður av blaðstjóra Dimmalættingar.

A. Samuelsen: Eg haldi ikki tað er nøkur grund til at bjóða hesum manni, tí norska ingeniørinum, her í løgtingið, fyri tað hann er angripin í Dimmalætting; hann hevir verið viðarbeiðari við eitt annað blað her í bý́num, har kann hann verja seg. Eg kann á ongan hátt vera við til at fáa nakran ingeniør her á fund við tingið á offentligum tingfundi, nakað annað er, at hann komur á fund við løgtingsnevndina í hesari sak. Eg veit ikki hvussu mínir partafelagar stilla seg til hetta, eg vil ikki vera við.

O. Effersøe: Jeg finder det i allerhøjeste Grad beklageligt, at den Skik er kommet ind i Udvalgenes Arbejde i Fjor, at Mindretallet fra en enkelt Person af Flertallet bliver ligefrem diktoreret noget. Det skete flere Gange i Fjor, at Hr. Patursson erklærede: Nu afleverer vi vor Betænkning, og der blev ikke givet Mindretallet Tid til at fremføre sin Betænkning. Det samme synes at være sket i Aar i nærværende Sag. Jeg maa henstille til Hr. Patursson, at han overholder Reglerne for Sagers Behandling i Udvalgene. Med Hensyn til denne Sag vil jeg sige, at jeg gerne vil komme til Stede til et Møde med Ingeniøren, men jeg synes, at det er rigtigst, at dette sker ikke i et offentligt Møde, men i et saadant Møde, som vi undertiden plejer at have af mere fortrolig og helt privat Karakter. Ellers synes jeg, det er rigtigst, at Ingeniøren indgiver sin Betænkning til Lagtingsudvalget, og saa dette henvender sig til Tinget med sine Udtalelser. Med Hensyn til det omtalte Møde synes jeg, at det er rigtigst, at det bliver paa den Maade, som Formanden foreslog for, og ikke et Skændemøde, hvor man imodegaar Avisartikler. Vi trænger til en rent saglig Diskussion.

J. Patursson: Hr. Effersoe byrjaði ógviliga salvelsesfult við at siga, at eg hevði »dikterað« — her eiga vit at minnast hvussu hann hevir »diktorað«, tá hann var í fleirtalinum: tað er ikki hóskandi fyri hann at koma við sovorðnum. Viðvíkjandi tí hann sigir um at fleirtalið ikki hevir givið minnitalinum tíð til at koma fram við sínari betonkning, so hevir minnitalið haft ógviliga góða tíð, frá januar til nú. Vit tingaðu um hetta seinast í gjár, og tá segði minnitalstingmaðurin við meg, at hann var samsintur við mær um, at hetta skuldi leggjast fram í dag. Tað tykist, at hann bert hevir játtað mær hetta fyri nú at kunna ganga ímóti mær. Eg meini, at hetta skal framleggjast nú, fyri at vit kunnu fáa gjollari upplýsingar frá ingeniørinum, hann hevir ikki tíð til at vera her í Havn í mangar dagar, so hetta má gerast skjótt. Eg haldi at tingfundurin skal vera fyri opnum durum.

O. Effersøe: Jeg vil paa det nest bestemte hævde, at i den Tid, jeg var i Flertallet her i Tinget, har i hvert Fald jeg sørget for, at Mindretallet fik Lejlighed til at fremsætte sine Anskuelser.

J. Patursson: Minnitalið hevur frá jannar til henda fund haft frlt fori til at taka sorstøðu, men fyrst ígjár sigir minnitalstingmaðurin við meg, at hann vil taka sorstøðu.

H. C. W.-Tórgarð: Harra Patursson var til steðar í áðrı táið eg talaði, annars vildi hann ikki kunna skyldað meg fyri tað, hann gjørdi, tí hann hevur ongar grundir til tess. Hrr. Patursson og eg talaðu um sakina ígjár, og eg bað hann leggja hana fram, og so skuldi mín frásøgn koma í morgin. Hann kann ikki leggja meg undir tað haun gjørdi. Vit talaðu um hetta í dag og tá haldi eg meg minnast, at hr. Patursson ynskti tingfund fyri lostum durum. Nú kemur hrr. Patursson og vil hava serligan tingfund ímorgin um hetta utan protokol, men offentligt; men tí vil eg bestemt mæla frá. Hrr. Patursson veit væl, hvat eg framførdi í nevndini, tá hann kom aftur úr útlondunum og hevði engagerað ingeniørar, og hann veit full væl at, tað var ikki tað sama sum hann og hrr. R. Nielasen meintu um hetta. Seinni havi eg við at arbeiða saman við einum øðrum ingeniøri um líknandi mál, fingið eina aðra sjón uppá hetta enn eg hevði frá fyrstani. Tað hevir ikki verið lætt at arbeiða í hasari nevndini; vit hava verið stevndir til fundar í einari stovu í tinghúsinum, har tað av ymsum grundum er ómøguligt at halda nevndarfund; vit komu til ein fund í gjárkvøldið, hvar vit skuldu gjøgnum ein stóran bunka, einki nevndarálit fyriliggur. Táið eg skal skriva mítt álit, so má eg vita, hvat ið fleirtalið framførir, men har var einki skrivað. Eg havi so fingið lyfti um at siggja teirra frásøgn í morgun og skal geva mítt álit ímorgin.

O. Effersøe: Jeg maa paa det bestemteste tilraade, at vi her følger samme Regel, som i parlamentariske Forsamlinger overhovedet, at man giver de forskellige Partier Lejlighed til at se, hvad der fremføres fra de forskellige Sider, saaledes at der kan komme en samlet Beretning frem til Medlemmerne til samme Tid. Det andet maa kun ske under særlig ekstraordinære Forhold.

Ved det Udvalgsmøde, som Flertallet siges at have holdt i Gaar Aftes, var Flertallets Del af Betænkningen ikke affattet. Hvorledes skal saa Mindretallet fremkomme med nogen Betænkning?

J. Patursson: Effersøe greiðir ikki rætt frá. Eg las frágreiðingina upp, sum hon er. Grundin til, at vit hava hettar fram nú er, at teir fremmandi ingeniørarnir eru her, og at vit ikki kunnu forsvara at binda teir longur.

H. C. W.-Tórgarð: Eg havi haft leiligheit til at siggja protokolliua. Tá Patursson sigur, at berætningin var orðrætt lisin upp í gjár, tá minnist Patursson ikki rætt.

R. Nielsen: Eg vil siga nokur orð til Samuelsen. At Samuelsen ikki vil verða tilstaðar, tá ingeniørin skal geva frágreiðing, tað undrar meg. Til Tórgarð vil eg siga, at tað er mær ófatandi, at hann hevur fingið aðra greiðt uppá sakina ífylgi samrøðu við hin íslendska ingeniørin, eg fati ikki, at Tórgarð nú hevur eina aðra støðu í hesi sak. Tað er ikki rætt, at man her í tinginum anugípnr ein mann (ingeniørin), so vit ikki kunna koma saman og samrøða við ham. Eg havi roynt at vegleiða hann. Tað er so ofta, at ein tosar um eitt og annað, áðren man kemur reiðiliga til sakina, eg meini tí, at tað er nevðugt, at vit koma saman.

H. C. W.-Tórgarð: Tað nyttar ikki at stríðast móti tveimum diplomatum sum Patursson og Nielasen. Eg vil spyrja R. Nielasen, um hann var tilstaðar á hotel Djurhuus t. 16. juni í ár og minnist, hvat eg framhelt har!

R. Nielsen: Eg havi hoyrt, at Tórgarð hevur nógv ímóti ingeniørinum, av tí, at hann skuldi vera interesseraður í einari privatari fyritoku.

A. Samuelsen: Tað er skiligt, at allir, ið skulu samrøða við ingeniørin, fyrst vilja kenna frágreiðingina. Eg fati ikki, at tað er nevðugt at hava konference í logtinginum í morgin. Skuldi tað vist seg, at logtingið ongagerar ein mann, skal hann geva tinginum eina skrivtliga frágreiðing, sum øll skulu lara at kenna og fáa at lesa, ikki bara hoyra hana uppi í logtinginum.

Ingeniørin hevur verið í einum plássi í Eysturoy og undirsókt eitt vatn, og hann hevur fortalt, at vatnið ikki dugir til at geva kraft. Nei, teknið tykkum til eitt privat selskap! tað batar tykkum meiri. Aðrir hava biðið hann koma, hann er ikki komin, men hevur givið teim tey ráð at taka kraft frá tí privatu selskapinum. Tað havi eg sagt, men tað er ikki at an-

gripa mannin. Nú eru vit við at koma so langt út her uppi, at tað er einki hopi í tí heila. Táið skulu koma 3 ókunnugir-menn, her, placera seg millum løgtingsmennirnar og spæla løgtingsmenn! Vit vilja ikki, hvorja ferð vit kritisera ein mann, senda boð eftir honum og fáa hann her inn í tingið til at forsvara seg. R. Niclasen tosar um, at eg ikki tori. Eg hugsi, at dirvi ikki er R. Niclasens sterkasta síða. Eg kann siga honum, at eg eri ikki bangin.

O. Effersøe: Vi maa ikke indføre ny parlamentarisk Skik i Lagtinget, det vil drive os ud i et Ufore. Det kan virkelig ikke gaa an, at Lagtinget bliver en Slags politisk Diskussionsklub. Hvad tror De, man nede i Rigsdagen vilde sige, hvis nogle Herrer, der ikke var Medlemmer, kom spadserende ind i Salen og deltog i Forhandlingerne. Ja, ikke engang i et af Rigsdagens Udvalg vilde det være tilstedeligt, at nogen fremmed kom til at deltage i Forhandlingerne. Der kan nok fremmede møde og give Oplysninger, og Udvalgets Medlemmer stiller Spørgsmaal til dem, men nogen Diskussion finder ikke Sted i de fremmedes Overværelse.

S. P. úr Kongi: Eg vil spyrja formannin, um nakar fremmandur maður kann koma til stoðar og taka lut í orðaskiftinum. Vit hava haft líknandi fyrr, tó í einum møti fyri stongdum durum. Ætlar formaðurin at fungera sum formaður, um fremmandir menn koma tilstoðar og taka lut í orðaskiftinum?

J. Paturssøn: Effersøe hevur sjálvur verið við til tílíkar fundir. Vit hovdu jú fund við kapteynin á »Tjaldrinum« og her var tá nógvur dráttur aftur og fram. Tá var ikki talan um at tað var nakað órímiligt at halda ein sovorðnan fund. Tað kann tí heldur ikki hesa ferð verða órímiligt at halda offentligan um ikki officiellan fund.

O. Effersøe: Jeg har ikke deltaget i noget Møde af den Art, som Paturssøn nævnte, men maaske har vi i Begyndelsen af Krigen haft et lignende Møde, men det var da paa Grund af den Nervøsitet og Forskrækkelse, som raadede da, — altsaa helt udenfor normale Forhold.

Formaðurin: Ingen uden Medlemmerne kan tage Del i en Forhandling i Tinget. Jeg vil ikke fungere som Formand ved et saadant Møde.

Fundur fríggjadag 8. august.

Frásogn millumtinganevndarinnar í vatnmáttarmálinum.

1. viðgerð.

J. Paturssøn: Eg skal í dag gova eina frásogn frá tí starvi nevndin hevir haft síðani hon var kosin í januar. Tað hevir ikki verið atgongd til at fáa fleiri eintøk av frásøgnini, og eg skal tí siga so greidliga frá øllum her, sum eg kann. Nevndin var sett 31. januar 1919 og valdi Jóannis Paturssøn til formann. Formaðurin var biðin um at søkja upplýsingar um lóggeving í Noregi og Íslandi hesum viðvíkjandi og at vita um hvaðani ein dugiligur verkfrøðingur kundi fáast og at leita sær upplýsingar í Noregi hjá kønum monnum, um teir halda tað hava týdning, at nevndin kemur til Noregi, og um so er, so at vísa okkum á hvørji plássi vit helst skuldu vitja. Upplýsingar hesum viðvíkjandi skuldi formaðurin senda heim til hinar nevndarmennirnar so hvørt sum hann fekk tær. Í mars flogboðaði eg, ið tá var staddur í Kvpmannahavn til hinar nevndarmennirnar heima í Føroyum, at nú var farandi til Noregs og spurdi eg um teir komu við. Frá R. Niclasen kom símskeyti aftur, um at hann kundi ikki koma, men at Tórgarð kom. Eg gjordi meg so til at fara og ventaði, at Tórgarð kom. Eftir nevndarsamtykt skuldu vit samráðast við justitsministaran um hvønn verkfrøðing, vit skuldu taka; tað gjørdi eg eisini, og justitsministarin bað meg bert taka ein verkfrøðing sum vit kundu líta á. Eg fekk mær so pass til Kristiania 11. mai. — Táið vit skuldu fara undir eitt stórverk sum hetta, tókti mær, at vit máttu hava alkonar menn, ið stóðu aftanfyri hesum; tað var ikki nógmikið at fáa nakrar verkfrøðingar til landsins, men tað mátti ansast eftir, at alt verkið varð endurskoðað av teim bestu mønnum, og tá helst av fyristøðumonnum fyri hesum verkum í Noregi. Eg fór tí tann 12. mai at hitta vasdragsdirektorin, soleiðis kallast tann ovarsti maður í Noregi, ið hevir við hesi mál at gera, eg fann hann ikki, men

hitti næsta mann á kantórinum, vit høvdu so eina langa samtalu um útlitið fyri at fáa nakað burtur úr vatnnøgdini í Føroyum, og var hann væl inni í okkara viðurskiftum. Hann helt, at tað ráddi sera nógv um, at fáa til hetta góðan mann, sum ikki einans var vatnskønur, men eisini dugdi at granska øll viðurskifti og ætla um alla nýtslu, ið fáast kundi úr vatnsnøgdini í Føroyum. Eg hitti so vasdragsdirektørin dagin eftir og talaðu vit leingi saman. Hann segði mær frá, at teir í Noregi høvdu í umbúna eina skipan fyri alt Noregs land, hvar-eftir teir ætlaðu at leggja allan vatnsmáttin undir felags almenna umsiting. Tað er eitt ógviliga stórt arbeiði at fara undir í einum landi ið er so stórt í vídd sum Noreg, og enn hava teir sjálvandi onga skipan fyri alt landið í øllum detaljum, meðan slíkar skipanir eru gjørdar fyri nakrar stak landspartar. Eg havi frá hrr. prof. Haegstad í Trándheimi fingið ein slíkan samlaðan plan yvir vatnsmátts útnýtslu í Trándheimis amti. Men tað var framhildið fyri mær, at í Foroyum vildi tað verða toliliga lætt at fáa allar oyggjarnar fyri norðan Skopunarfjørð í eitt felag, hvat ið viðvíkir útnýtslu av vatnsmátti. Tað var sagt mær, at tað vildi verið so lætt, at um teimum t. d. á Viðareiði nýttust einar 50 h. k. meira, so var tað bert at trísta á ein holg, so vóru tær har. Teir fingu kort yvir Foroyar frá generalstabena í Keypmannahavn, tað fingu teir eisini, táið teir hjálptu okkum við vegabygging her á landi. Eg fór til Bergen 14. mai, har fekk eg hrr. verkfrøðing Blauw at sýna mær náttstøðir á Vesturlandinum. Eg hevði hitt hrr. Blauw fyrr og vendi eg mær tí til hansara. Vit sóa eina náttstøðu í Fotlandsvaag, hon var uppá 14,000 h. kr.; teir vóru har ógviliga blíðir við okkum. Tað var eitt fjallavatn hogt uppi, og úr tí varð vatnið leitt fyrst beint fram ígjøgnum enn tunnel og síðani niður eftir. Tá eg kom aftur til Kristiania hevði vasdragsdirektørin lugt at kortunum; hann segði, at at vatn var nógnógv í Føroyum, eisini í Suðuroy, og lovaði hann at hyggja eftir skipan okkara, táið hann var liðugur. Eg var nú ikki so komin í øllum hesum viðurskiftum og bað eg tí hrr. Blauw geva eina frásogn frá ferðini: hon liggur her við, og skal eg lesa hana upp. (Upplestur):

Kommissionen ankom til Bergen den 15. Maj om Formiddagen og mødtes paa Stationen af Ingeniør Haakon Blauw, som var tilsagt at yde Kommissionen den nødvendige tekniske Assistance og at aabne den Adgang til et formødent Antal Anlæg, der kunne formenes at være af Interesse og danne et Forbillede for en paatænkt Vasdragsanordning for Færøerne. Samme Dags Eftermiddag besigtigedes Bergens Kommunnes Omformerstation med tilhørende Damp-Reservevanlæg og den højspændte Sekunderstation paa Solheim.

(Her er tala um tveir streymar: Ligestrøm og højspændt Strøm; táið talan skal vera um ein landsplan, dugir ikki at nýta meira enn annan, tí tað verður so ógviliga dýrt at hava apparatir til at skifta teir um við).

Bergens Kommune har sit Vandkraftsanlæg beliggende i Samnanger, hvorfra Strømmen føres i en 40 km højspændt Dobbeltledning til Sekundærstationen paa Solheim. Her nedtransformeres Spændingen til 7500 Volt og føres for en Del i en højspændt Kabel til Omformerstationen i Byens Centrum for at omformes til Ligestrøm, som forsyner Byens centrale Dele med Kraft, medens en anden Luftledning paa 7500 Volt fører Strøm til Byens Udkanter og større industrielle Bedrifter, som forsynes med Vekselstrøm.

At Byen har 2 Strømsystemer, beror paa, at man fra først af, før Vandkraftsanlæggene endnu havde faaet Udbredelse, havde bygget en Dampcentral, der producerede Ligestrøm, og da alle Maskiner og Apparater i Byens Centrum var indrettet paa dette System, blev det for kostbart at forandre dette. Ligestrømmen har sine Fordele fremfor Vekselstrømmen, men den har den store Mangel, at den ikke lader sig overføre paa længere Afstande, da Strøm- og Spændingstabet bliver for stort og hele Anlægget saaledes uøkonomisk for længere Distancer.

Den højspændte Vekselstrøm i Byens Udkanter nedtransformeredes i Transformatorkiosker til 220 Volts Spænding og fordeltes saa til Forbrugerne.

Kommissionen indsaa det uheldige i at have 2 Strømsystemer, da dette betyder Krafttab og falder kostbart, og gælder det saaledes at faa anlagt et Strømsystem helt fra Begyndelsen af.

Sekunderstationen gav et meget tiltalende Indtryk, alt var greit og oversigtlig anordnet. Intet var spart for at give Anlægget den størst mulige Driftssikkerhed og yde Personalet den bedst mulige Beskyttelse.

Den gamle Dampcentral og Omformerstationen blev derpaa besigtiget, og blev

man vist rundt af Maskinmester Dahl, der med megen Elskværdighed redegjorde for Stationens Historie og Udvikling.

Man fik saaledes Anledning til at se de første dampdrevne Generatorer fra 1898, drevne af Stempelmaskiner og som fremdeles udgør en Del af Reserven. Af disse var installeret 4 Maskinsæt. Det næste Trin i Udviklingen af Dampanlæg er de drevne Turbinanlæg. Af saadanne forefandtes 2 Stkr. Parsons Turbogeneratorer, der er hypermoderne Maskiner i sit Slags og meget dampbesparende. Disse udgør Hoveddelen af Dampreserven. Ligeledes var som Nødreserve opladet et større Akkumulatorbatteri i Kælderen.

Efterpaa besaa man Omformeraggregaterne, monteret i samme Maskinsal. Af saadanne fandtes 2 Synchron-Enankeromformere, 1 Asynchronomformer og 1 Kaskadeomformer, der omformer den højspændte 7500 Volts Vekselstrøm til 2 × 220 Volt Ligestrøm, der forsyner Byens centrale Dele med Strøm. De elektriske Sporveje forsynes med Strøm fra et eget mindre Omformeraggregat. For hurtig og let at kunne flytte de svære Maskiner af sine Fundamenter ved Reparationer var der installeret en elektrisk drevet Lobekran.

Apparatanlægget var monteret paa en »Bro«, en Etage over Maskinerne, slig at Vagten havde udmærket Oversigt over Salen. Her oppe forefandtes de nødvendige Instrumenter og Apparater til Betjening af Maskinerne og var alt saa greit anordnet, at hele Betjeningen bestod af kun 2 Mand i hvert Skift, hvoraf 1 som Apparatvagt og 1 som Maskinvagt.

Det hele var anordnet med Udvidelse for Øje, og blev der meddelt, at Forbruget af Strøm havde steget saa hurtigt siden det ny Anlæg blev aabnet med sine 40,000 H. K. i 1912, at man nu var begyndt at planlægge en helt ny Kraftstation for i Tide at kunne møde de voksende Krav paa elektrisk Kraft.

Fredag den 16. Maj rejstes med Motorbaad, som var stillet Kommissionen til Disposition, til Fotlandsvaag for at bese Hossanger, Haus og Hamre Kommuners interkommunale Kraftanlæg.

Dette Anlæg paabegyndtes i 1916, og var man nu saa langt kommet, at der blev Adgang til at iagttage Monteringen af Maskinerne. Anlægget skal ved 125 m Fald yde 14 000 H. K. fordelt paa 4 Maskinsæt á 3,500 H. K.

Under Afdelingsingeniør Dahls Ledelse skred man til Besigtigelse af Anlægget, idet man begyndte med Kraftstationen. Denne var en usædvanlig vakker Bygning, udført af Natursten. Greit og oversigtlig var det hele ordnet, saavel Maskinsalen som Apparatanlægget.

Det særegne ved dette Anlæg er, at Rørledningen er sløjfet, og at en Tryktunnel er anvendt i Stedet. Herved spartes c. 200.000 Kr., men fordres der et særlig haardt og stærkt Fjæld for at kunne modstaa det voldsomme Vandtryk. Ved Udløbet af Tunnelen var der placeret en automatisk Tallerkenventil, der automatisk lukker sig, naar Vandhastigheden i Tunnelen blir for stor, grundet Uheld i Kraftstationen. Naar denne Ventil traadte i Funktion, udløser den samtidig en Klapventil oppe i Indtogsbasinet, og derved stoppes al videre Vandtilstrømning til Tryktunnelen. Dette fandtes at være en meget betryggende Anordning, hvor saa store Kræfter skal holdes i Tømme.

Derefter gik man op til Indtogsbasinet, som var helt nedsprængt i Fjeldet til en Dybde af 19 m. Ned i Bassinet førte en Jerntrappe, for at de i Bassinet placerede Ventiler og Lukkemaskineri let skulde kunne inspiceres og repareres. Her var ogsaa placeret den for omtalte Klaphuse med tilhørende Hejseindretning, videre en Tomme-ventil for Indtogsbassinet og en Paafyldningsventil for Tryktunnelen. Her munder ogsaa den ca. 1400 m lange horisontale Tunnel ud, forer Vandet fra Lotveitvandet til Tryktunnelen. Denne Tunnel munder ud ca. 4 m under Lotveitvands Overflade, som paa denne Maade faar en samlet Reguleringshøjde af 14 m. Mellem Tunnelen og Indtogsbasinet var placeret en Række Fin-Rister for at forhindre Forureninger at komme ned til Maskinerne. Hele dette Lukkemaskineri fungerede automatisk ved Ulykkestilfælde og kunde ogsaa bevæges ad elektrisk Vej fra Kraftstationen.

Ved Tunnelens Udmunding i Lotveitvand var ligeledes anordnet Finrister og en Stængeluke for at hele Tunnelanlægget skulde kunne torlægges. Denne Luke kunde bevæges baade ved Haandkraft og ad elektrisk Vej fra Kraftstationen.

Hele Anlægget gav et godt Indtryk, det var solidt bygget og meget oversigtligt. Fra Kraftstationen førtes Strømmen i højspændte Ledninger 20,000 Volt rundt til de respektive Kommuner, hvor man ved Hjælp af ca. 60 større og mindre Transformatorer nedtransformerede den til 220 Volt og fordelte den til Forbrugerne. Disse

mindre Transformatorer var monteret paa selve Ledningsmasterne ude i fri Luft. Dette betyder en stor Besparelse i Anlægsomkostninger. Tilslutningen til Anlægget var allerede nu saa stor, at om faa Aar vilde det have naaet sin Ydeevne, og havde Kommunerne allerede nu, før Stationen var sat i Drift, sat i Gang Planlæggelsen af endnu en ny Kraftstation, for i Tide at kunne møde Kravet paa elektrisk Kraft.

Efter Besigtigelsen af Anlægget var man Anlæggets Gæster, hvor Ingeniør Dahl fungerede som Vært, og fortsattes til Bergen om Aftenen med ekstra Motorbaad.

Den 11. Maj om Morgenen rejste man med Toget til Fane St. og tog Skyds over Fjeldet til Sogstad, hvor man besigtigede et privat Kraftanlæg, tilhørende Hr. Tøndefabrikant Anfindsen, og fuldført Høsten 1918.

Anlægget formenes at være af den Type og Størrelse, som vil kunne faa udstrakt Anvendelse paa Færøerne. Anlægget blev derfor viet en indgaaende Undersøgelse, og Ingeniør Blauw, der havde bygget Anlægget, redegjorde for dets Historie og gav de nødvendige tekniske Oplysninger.

Kraftstationen, der er opført af rød Teglsten, ligger lige ved Havet, slig at Afløbsvandet fra Turbinerne faar den korteste Vej. I Stationen var indstalleret 2 Francisturbiner, der ved et Fald paa 30 m udviklede hver 85 H. K. Turbinerne var forsynet med automatiske Regulatorer for Vandtilførselen, slig at med varierende Belastning, formindskedes og forøgedes Vandtilførselen efter Behovet, derved spares paa Driftsvand, samtidig som man kan undvære Betjening, idet Maskinerne kun behøver Tilsyn et Par Gange om Dagen for at smøres. Dette betyder naturligvis en stor Besparelse for et lidet Budget.

Til Turbinerne var direkte tilkoblet 2 Vekselstrømsgeneratorer 5 K.W.A. 220 V. Apparatanlægget var monteret paa den ene Tværvæg og var der indrettet et eget Transformatorrum.

Vandet førtes i en 200 m lang Ledning af helvalsede Rør, 65 cm Diameter, og som var monteret paa Betonfundamenter. Rørledningen var forsynet med de nødvendige Paaslipningsventiler tillige med Mandlaag, for Inspicering af Røret. Røret munder ud i et Indtogsbassin, 8 m dybt. Dæmningen var opført af Brudsten og forsynet med ½ m tyk Betonstøbning paa Vandsiden og 20 cm Støbning paa Luftsiden. Fra Bassinet strømmede Vandet gennem en Paaslipningsluke ind i Rørkammeret efter at have passeret en Række Finristen. Baade Hovedbassinet og Rørkammeret var forsynet med Tømmeluker for Tørlægning ved Reparationer. Anlægget forsyner den paa Stedet liggende Tøndefabrik med Kraft tilligemed et Savbrug. Ligeledes faar de i Distriktet liggende Gaarde sin Kraft fra dette Anlæg.

Som Helhedsindtryk af de besigtigede Anlæg lagde man Mærke til, at intet blev spart, som kunde forøge Driftssikkerheden og beskytte Anlæggene mod Uheld, og Udstyret gjordes saa tiltalende, som mulig.

Kraften fordeltes altid paa flere Maskinsæt, derved opnaas, at om en Maskine skulde være udsat for Skade, kan denne Maskine udkobles, medens det øvrige Anlæg fortsætter Driften uforandret, dette er selvsagt en stor Fordel.

Man fik ligeledes Indtryk af, at Udnyttelsen af Vandkraften var i en rivende Udvikling, de færdigbyggede Stationer blev snart fuldbelastet; og man havde Vanskelighed med at tilfredsstille Efterspørgselen, idet Kraften foruden i Industrien ogsaa fandt udstrakt Anvendelse i Landbrugets Tjeneste.

Hettar var alt so eitt frágreiðing frá ferðini til Bergen. — Tá eg hevði verið har, fór eg aftur til Keypmannahavnar. Tá var Rasmus Niclasen komin, og vit hildu so fund tann 22. maj. »Á fundi vóru R. Niclasen og J. Patursson. Patursson greiddi frá ferðini til Noregs og bar uppá mál um, at nú mátti nevndin velja mannin til at fara undir verkið at ransaka líkindini fyri ravmagns nýtslu í Føroyum, soleiðis sum ásett var í nevndarálitinum.

R. Niclasen greiddi frá, at ein íslendskur verkfrøðingur nú var í Havn til tess at granska vatnsmagnið í Sandá og fleiri áum í nánindu av Havnini. Hann hevði tosað við henda verkfrøðing áðrenn hann fór, men helt, at hesin hevði so nógv at starvast við í Íslandi, at hann valla kom at verða fáandi til at taka sær hetta mikla starv um hendi, sum var at granska í Føroyum. Um aðrar íslendskar verkfrøðingar var tá einki kunnugt, men talað var um, at kundi tað lagað seg soleiðis, vildi tað verið beint, um ein samvinna hevði fingist í lag millum norskar og íslandskar verkfrøðingar hesum máli viðvikjandi.

Niðurstøðan var so tann, at skuldi hetta ransókningarverkið stovnast í sunnar, var tað beinasta og einasta at gera, at taka ein norskan verkfrøðing. Enn tá eisini almanna starvandi norskir verkfrøðingar

vóru ringir at fáa fatur á, tí so fáir vóru til, soleiðis sum sæst av tøirri frágreiðing, Jóannes Patursson hevur givið, var einki utan at taka ein privatan mann.«

Eg havi einki ímóti, at vit hava íslendskan verkfrøðing til at arbeiða her. Men Íslendingar hava ikki tær royndir sum Normenn. Teir hava mest roynt at fáa nýtslu úr vatnum til elektricitet. Besta slag af kreftum fáa vit við norskum kunnleika. Hesin Íslendingurin hevur verið vegverkfrøðingur í Íslandi. Eg vil seta prís uppá at vit samarbeiða við honum um tað nýtist. Hettar hevur hr. Blauw gingið inn uppá. Í skrivilsi millum hr. Blauw og meg, sigir Blauw, at hann kemur higar við Botnin og ætlar at taka ein verkfrøðing við sær. Tað nátti eg lata honum um. Nevndin hevði ikki mandat til at taka meir enn ein verkfrøðing. Í bræv, eg sendi hr. Blauw hin 9. juni skrivaði eg: »Angaaende Assistenten, saa har jeg intet Mandat til at antage samme, saa han faar rejse for Deres Regning og Risiko«. Eg vildi halda fram, at Havnar býráð vildi seta prís uppá at tinga við hr. Blauw, og í sama bræv skrivaði og tí til hansara: »Som jeg før har skrevet om, vil jeg atter erindre om, at i Tilfælde af, at det befindes at være hensigtsmæssigt, maa det ikke være udelukket at islandsk Ingeniørassistance med arbejder«. Eg havi bræv frá Vasdragsdirektørinum, at hann og hrr. Blauw hava confererað og úrslitið av tí varð at tað varð uppsett ein skipan um hvussu arbeiðið skuldi gerast. Tann 26. juni helt nevndin fund í Havn. Her var samtykt »at táið verkfrøðingurin var komin til lands skuldi honum vísast á at starva fyrisunnan fjørð fyrst og byrja verkið annaðhvørt í Sandoynni ella Suðroynni. Viðvíkjandi løn og øðrum treytum var samtykt um tað var gjørligt, so ikki at gera festarmál lougur enn til Ólavsøku fyri fyrst, so tingið sjálvt kundi áseta mannagongu og lønir fyri eftirtíðinar. Men tað má gera tað sama, um vit høvdu fest mannin ella ikki, tí verkfrøðingarnir hava fastar takstir at ganga eftir. Danskir verkfrøðingar sum verið hava her uppi, hava eisini haft fastar takstir. Vit samráddust so um reglur fyri arbeiðinum í Føroyum og úrslitið varð sum tað sum avgjørt var í Kristiania millum hrr. Blauw og vasdragsdirektørin. Eg skal lesa hettar brævið frá vasdragsdirektørinum til hrr. Blauw: »Jeg har modtaget Deres Brev af 6. og 10. ds. I det første meddeler De, at Deres Plan for Arbejdet paa Færøerne er at igangsætte Nedbørsmaalinger og Maalinger for Afløbet fra alle de regulerbare Vasdrag af nogen Betydning, og som kan tænkes at kunne arbejde i Tilknytning til en fælles Plan for alle Øerne. Dernæst at foreta de nødvendige Undersøgelser for Grunden til eventuelle Stationer, Dæmme og videre bygningstekniske Arbejder, og at opta de til Arbejdet fornødne Profiler og øvrige Maalinger. Alt dette Arbejde er jo særdeles vigtigt for Udredning og Planlæggelse af Færøernes Elektricering, men det er ikke overkommeligt i en rimelig Tid for én Mand. Hvis De skal rejse alene, maa De lægge en begrænset Plan, saa at Arbejdet bliver mest muligt frugtbringende«. Vit hava roknað at so og so nógv regnar í Føroyum. Men teir meina at tílíkar roknингar ikki eru so nógv at fara eftir. Vasdragsdirektørurin sigir soleiðis m. a. í hesum brævinum viðvíkjandi vatnumetingar: »Her i Landet har vi liden Glæde af disse, dels fordi Maalestationens Beliggenhed fortrinsvis samler sig om de bebyggede Landsdele og kun sparsomt paa det ubeboede Højfjeld, og dels fordi Maalingerne er upaalidelige, idet Nedbøren under Storm ikke helt opfanges af Maaleapparaterne. Jeg vil derfor ikke anbefale, at De lægger for meget Arbejde i disse Observationer«. Hr. Blauw kemur so til Havnar 26. juni og hevir hrr. Dahle og hrr. Platou við sær. Tá var nevndarmaðurin Tórgarð farin til útlondini og R. Niclasen var staddur í Vágum. Formaðurin var staddur í Havn. Hr. Blauw bar fram hjálogdu fyriskipan frá vasdragsdirektorinum. Formaðurin greiddi frá at nevndin hevði avgjørt at fyrst skuldi vatnsnøgdin fyri sunnan fjørð granskast. Hr. Blauw samtykti hettar. Formaðurin ásetti so at hrr. Blauw skuldi ganga eftir teimum reglum, sum hann hevði fingið frá vasdragsdirektørinum og yvir hvørt starvast sum hann best dugdi á at skyna. So hava vit fingið fram nógvar lógir, lóguppskot, stórtingsforhandlingar, lógir frá Danmark og Íslandi og úr Noreg ein hóp. Nú hevur minnitalið borið nakað fram, sum sigir at tað ikki er samsint við okkum. Áðrenn eg kom higar niðan í dag, fekk eg frá hrr. Blauw eina rapport yvir tað sum hann hevur gjørt. Hon ljóðar so: »I Henhold til Skrivelse af 31. Maj 1919 fra Udvalgets Formand hr. Patursson om at overtage Arbejdet med at udarbejde en Plan for Udnyttelsen af Vandkraften paa Færøerne, har jeg haft en personlig Konference med den norske Vasdragsdirektør og i Samraad med ham opsat et

Program for Igangsættelsen af Arbejdet. Programmets første Post lyder: »at igangsætte direkte Afløbsmaalinger i de Vasdrag, som egner sig for saadanne Maalinger, hvorved man kan opnaa at faa typiske Normaler for Vasdrag paa Regnsiden af Øerne og i Regnskyggen, og med disse Maalinger som Grundlag senere at foretage Proportionalitetsberegninger for Afløbet af andre Elver. Programmets 2den Hovedpost lyder: »At foretage Grundundersøgelser for Damme, Rør, Tunnel og Kraftstationer, at udføre i den Rækkefølge, som de respektive Vasdrags Beliggenhed og Kraftforhold tilsigere. Efter disse 2 Hovedlinier har Arbejdet i Sommer været udført og skal jeg i det efterfølgende i Korthed redegøre for det udførte og i nærmeste Fremtid forestaaende Arbejde. Den forefundende Vandkraft paa Øerne maa man inddele i 2de Klasser:

(Tann reguleranði vatnsmáttur er tann ið frankemur har tað kann demmast upp, tann óreguleranði er tann, ið má takast táið tilber, eftir sum áarfoti er.)

1) Den regulerbare Vandkraft og 2) Den uregulerbare Vandkraft. Den første Klasse, den regulerbare Vandkraft, er den Kraft, der repræsenterer noget af Værdi og som med Fordel kan bringes til Anvendelse i det daglige Liv. Den anden Klasse, den uregulerbare Vandkraft, har liden eller ingen Værdi, naar den skal optræde som selvstændig Kraftkilde, idet indtrædende Tørke og Frost, kanske i Perioder, hvor Kraften mest trænges, kan reducere Vandtilførslen i den Grad, at Kraften helt udebliver. Kan den uregulerbare Vandkraft derimod samarbejde med den regulerbare Kraft paa en Maade, slig at i Flomperioder den uregulerbare Kraft benyttes og man derved kan spare paa Vand i de regulerbare Vasdrag, da er der en Chance for med Fordel at kunne benytte denne Kraft.

Fremgangsmaaden bliver da denne: Først at udnytte alle de regulerbare Vasdrag til deres fulde Ydeevne, og siden som Supplement at gøre Brug af den uregulerbare Kraft.«

Hann hevir nú verið og grannskað á fylgjandi plássum. Av reguleranði áum og vøtnum: 1) Breiðá við Eiði, 2) Toftavatn við Toftir, 3) Fossá við Vestmanna, 4) Leynnarvatn, 5) Seyrvágsvatn, 6) Fjallavatn í Vágum, 7) Stevná í Hesti, 8) Sandsvatn, 9) Erjufoss i Sandoy, 10) Kirkjuvatn í Fámjin, 11) Ryskivatn við Vág og 12) Hóvsá við Hovi.

Av óreguleranði hevir hann grannskað: 1) Gravsá við Klaksvík, 2) Heljará í Vestmanna, 3) Sandá við Tórshavn, 4) Áðalsá í Skúvoy, 5) Stórá í Trongisvági, 6) Dalsá í Hvalba, 7) Stóra Foss í Fámjin og 8) Stórá í Sandavági.

Á fylgjandi plássum eru gjordar støður, har vatnsnogdin kann verða mátað og eru settir menn at ansa teim: 1) Breiðá við Eiði, 2) Fossá íV estmanna, 3) Heljará í Vestmanna, 4) Leynnarvatn við Leynnar, 5) Sandá við Tórshavn, 6) Seyrvágsvatn, 7) Sandsvatn, 8) Hovsá við Hovi og 9) Stórá Foss í Fámjin.

Hesum mátingum mega vit halda fram við í mongum árum fyri at fáa tol ið vera heilt álítandi, tí regnnogdin er ymis tey ymsu árini.

So sigir hr. Blauw frá, at hann hevir fingið boð frá hrr. postekspeditøri Nolsø um at koma til Tvøroyrar og grannska har og hann er eisini biðin um at koma har av løgtingsmanni Strøm. Eisini hevir hann hjálpt Kláksvikar kommunu við at byggja eftir einum uppskoti til máttstøðu við Gravará.

Í einari eftirskrift sigir hann um moguligheitirnar norðuri við Streym:

»Udenom dette Arbejde har Strømmen ved Sundelaget været befaret. Ved Udnyttelsen af denne Kraft vilde først den Ulempe opstaa, at al Trafik herigennem maatte standses, hvilket vel vanskelig kan gøres, ligesom et saadant Anlæg nærmest vilde blive et Eksperiment, at udføre paa Bekostning af hele Elektricitetssagen og let kunne blive skæbnesvangert, da Erfaringen viser, at første Gang, en helt ny Ting skal sættes ud i det praktiske Liv, det sjældent lykkes at bygge det helt korrekt med en Gang, da altid uforudsete Ting og Vanskeligheder opstaar.«

Nú er jú ætlanin at hava privatan tingfund við hr. Blauw, so kann hann greiða meira frá. — Eg skal so siga eitt sindur um, hvussu kundi vera framgingið við teim umsóknum, kommunur geva inn um at fáa henda verkfrøðingin til sín at kanna eftir mogulighoitmi á teirra plássum. Nú hr. Blauw heldur seg vera nøstan lidnan við hesa,. sum hann kallar tað, generellu rannsókn, hevir Vágs kommuna biðið hann koma suður har, og so moga vit vita, hvussu skal vera atborið. Tað má vera so, haldi eg. at tað frá kommmunum kemur boð til nevndina um at fáa ingeniørin til sín, og nevndin sendir hann so har og har. Hann er jú so at siga nú í hesi stund at kalla landsingeniørur okkara. Kommunur-

nar mega so rinda logtinginum aftur, hvat sendiferðin kostar tinginum.

Formaðurin: Det forekommer nævnt i Beretningen og Ordføreren fremførte det ogsaa i sin Tale, at Justitsministeriet har samtykket i, at Udvalget antager en Ingeniør. Jeg skal da paa Amtets og ogsaa paa Lagtingets Vegne sige, at jeg ikke har modtaget nogen Meddelelse fra Justitsministeriet herom. Der er til Amtet kommet en Meddelelse om, at der af Finanshovedkassen er udbetalt for Lagtingets Regning 1000 Kr. til Rejseudgifter for Udvalget, men ingen anden Meddelelse.

J. Patursson: Ja, tað er jú nógv, sum vit hava biðið um niðri og ikki fingið boskeð um, hetta er ikki tað einasta. Táið eg spyrji justitsministaran, sum avrátt var í nevndini, um hvønnu verkfrøðing vit skulu taka, og hann so svarar: gerið tit, sum tit halda vera best, eg skal samtykkja, so haldi eg, at eg standi fríur. Eg skrivaði 9. juni til justitsministaran, sat jeg under Forventning af Justitsministeriets Approbation har antaget hr. Ingeniør Blauw, Bergen, til Undersøgelse af Mulighederne for Udnyttelse af Vandkraft paa Færøerne for Færø Amtskommunes Regning«. Eg fari persónliga til hansara, og hann sigir, at hann skal ekspedera hettar, eg kann ikki gera við, at her ikki er komið boskeð. Vit kunnu ikki bíða við arbeiði til Føroya gagns og besta, fyri tað, at teir eru seinførir í ministeriinum.

H. C. W.-Tórgarð: Táið formaðurin ígjár framlegði frásøgnina, segði eg, at eg vildi framliggja sjálvstøðuliga frásøgn. Tað var tikið mær illa upp, men eg siga aftur her, hvat eg segði ígjár, at hetta kemur fram í fullum forstáilsi við nevndarformannin. Eg haldi tað vera beint at siga fra míni serstøðu. Frásøgnin er framkomin í morgun og allir tingmenn kunnu ikki hava fingið stundir at lesa hana, so eg vil siga greidliga frá henni. Táið vit høvdu fyrsta nevndarfund, var sett fram uppskot um, at nevndin skuldi út at ferðast fyri at kanna eftir líknandi viðurskiftum. Eg helt, at tað var ikki tann uppgáva, vit høvdu fingið frá tinginum, og eg dugdi ikki at síggja, hvat tað skuldi hava at týða, um nevndin fór at ferðast til Noregs ella Íslands, tí tann umráðandi grannskingin í sakini skal jú gerast av sakkønum monnum. Eitt annað var, um hesin tanki virkuliga skuldi verða realiseraður, um her var tala um amtskommunal verk ið skuldu til at byggjast, um so nevndin fór til Noregs og Íslands. Táið vit skulu gera ein plan hartil, vil tað sjálvandi vera av stórum týdningi at samráðast við vasdragsdirektørin í Noregi og við lóggávumyndugheitirnar, men tað kann gerast skriftliga. Vit kundu haft sent kort yvir Føroyar til eitt ingeniørkontór í útlondunum og fingið aftur ein detailleraðan plan. Viðvíkjandi tí ferð, formaðurin gjørdi til Noregs, fyriliggur einki játtilsi frá mínari síðu hartil. Tað var samtykt í nevndini, at formaðurin skuldi gera okkum kunnugar við hvat hann fyrítók sær. Tá hann so telegraferaði um at fara til Noregs, segði eg við R. Niclasen, at og hevði eitlað mær burtur í onnur erindi, og um hetta kundi bera til at hóska við ta ferð, kundi eg kanska fara til Noregs eisini. Eg fór allíkavæl ikki av stað tá. Síðani veit eg av ongum fyrr enn fundin hin 16. juni, hvar formaðurin framlegði frásøgn. Har var eingin nevndarbók førd á tí fundi, har var ikki ein pappírslepi á borðinum. Hr. Patursson greiddi frá sínari ferð á nakað sama hátt sum í dag; eg framhelt tá, at eg kundi ikki játta, at her var engageraður verkfrøðingur, og eg kundi ikki játta, at her var engageraður netupp hesin persónurin, hr. verkfrøðing Blauw í Bergen, og fyri tað triðja, at eg kundi ikki játta, at hann var engageraður utan at tað var fastsett, hvat hann skuldi hava í løn. Um hesin maður var komin higar í vár, hevði eg einki haft ímóti honum, men síðani hava vit haft ein mann her, ið hevir arbeitt fyri Havnar kommunu, og har havi eg fingið eitt sindur at vita um, hvat ið vit kunnu krevja í hesara sok. Eg má halda fram, at tað var nóg mikið ið løgtingið gjørdi, um vit høvdu nóg góð kort yvir Føroyar, sum vit sendu til góð ingeniørkantór burturi í útlondunum; so vildu vit frá teimum fingið aftur ein plan, ið kundi nýtast sum grundarlag fyri einum arbeiði.

O. Effersøe: Der er ikke Tvivl om, at Sagerne vil komme til at foreligge saaledes, at vi i nogle Tilfælde vil søge om Statslaan for at fremme dem. Det vilde have Betydning, om denne Sag fra første Haand var gaaet igennem den danske Regering, som sikkert paa bedste Stod vilde søge sagkyndige. Vi havde da staaet heldigere end vi nu staar. Imidlertid er vi nu færdige med dette. Hvorledes har

nu Udvalget gennemført Tingets Beslutning. Det synes ikke at have gaaet saa heldigt til. Det er klart, at Udvalget ikke har samarbejdet godt, og at Udvalgets Formand i for høj Grad har paataget sig det, som paahviler Udvalget. Det er ikke heldigt for Sagens videre Fremme. Heldigere vilde det være, om Udvalget i en saa betydelig Sag optraadte enigt og med større Forsigtighed. Der foreligger ikke noget om, at der har været samarbejdet med Ministeren. Ordføreren siger, at han har haft Konference med Justitsministeren. Men vi har ingen Garanti for, at Justitsministeren har opfattet ham rigtig. Der burde foreligge noget skriftligt derom, noget klart og tydeligt. Udvalget kunde skrive til Justitsministeren og faa Svar igen. Der er heller ikke under denne Sag andraget Justitsministeren om Bevilling. Jeg kræver nærmere Rede for, hvad Udvalget har foretaget sig her. Og hvorledes har det sig med Udgifterne? Tingets Kasser skal jo betale Halvdelen. Men hvem skal betale den anden Halvdel? Der skal skaffes Sikkerhed derfor. Det er ogsaa uheldigt, at Indberetningen foreligger som Flertals- og Mindretalsindberetning. Jeg undrer mig over, at der er kommet tre Ingeniører til Undersøgelse af Sagen, medens Tinget vedtog, at der skulde være en. Dette staar i Strid med Tingets Vedtagelse. Jeg kan ikke se rettere, end at det er uheldigt, at Kommissionen har engageret denne Ingeniør. Vedkommende er maaske en dygtig Mand. Men der er Forhold til Stede, som gør, at det kan siges, at det er ikke som det skulde være. Der blev af Ordføreren oplæst Beretning fra paagældende Ingeniør. Det vil jeg ikke udtale mig om. Om vi ikke er sagkyndige her i Tinget, maa vi dog prøve paa at følge med i Sagen. Den generelle Undersøgelse er færdig. Angaaende Forhandling om Antagelse af en Ingenier og dennes Opgave har Tinget besluttet, at der skal foretages en almindelig Undersøgelse. Ser vi Aktstykkerne igennem, fremtræder det, at Kommissionen paa Forhaand har taget Beslutning om, hvordan Undersøgelserne skal foregaa.

I Stedet for dette burde Patursson have meddelt Ingeniøren, hvad Lagtinget har vedtaget, og intet andet. Saa blev det Ingeniørens Sag at afgøre, hvordan han vilde undersøge. Her tales om mundtlig Konference; jeg ved ikke, hvad det er for mundtlig Konference. Det fremgaar, at der er givet Ingeniøren den Opgave at lede og foretage Planlæggelse af et Landsorganisation af Oernes Vandkraft. Om dette indeholdes der intet i Tingets Beslutning. Jeg retter denne Anke til Kommissionens Flertal. Mindretallet synes at være skubbet til Side. Det har vel sine Vanskeligheder for et staaende Udvalg at samarbejde godt: men det er nødvendigt. Naar vi imidlertid har faaet Sagen ind i denne Gange, maa vi se at faa det bedst mulige ud af den. Jeg vil bidrage mit til, at vi kan komme til et gavnligt Resultat. Tingets Tanke i sin Tid var, at man skulde se at komme til mere faste Resultater, byggede paa sagkyndige Udtalelser. Dette er Tingets Tanke.

R. Nielsen: Eg eri í nevndini, men skal tó ikki dvølja við fleirtalsbetonkningunum, tá hann er so væl frágreiddur av ørðføraranum. Men eg stúrsaði yvir minnitals betonkningin. Eg trúði ikki, at man vildi fáa eina tílíka kritikk. Minnitalið, tað er Tórgarð, sýnist ikki at hava verið við til tað sum eg havi fyritikið. Vit fingu brøv í vetur frá Patursson. Tá mann lesur tað, sum vit hovdust at á fyrsta fundi, so var nevndin samsint í at undirsøkja. Tað var ikki so, at man sjálvur skuldi fara til Noregs og Íslands. So vóru líkindi hjá Patursson at fara til Noregs. Eg var í Klaksvík í hesum bili, og Tórgarð ringdi so eftir mær. Vit komu so á fund, og Tórgarð sigir, at hann vildi fara til Keypmannahavnar ella Noregs ella Svøríkis. So helt eg við hann, at bæði Patursson og hann kundu fara til Noregs. Tórgarð var ikki vísur í, at hann kundi fáa pláss uru borð í ti skipi, ið fara skuldi, men eg fekk tað inntrykk, at hann hevði tann besta hug til at fara til Keypmannahavnar til Jóannes Patursson. Eg setti so telegram saman og telefonaruði til hr. Tórgarð og las tað fyri honum í telefonini; eg hevði vitni inni uppá, at tað var sent soleiðis av stað, sum tað var lisið upp. Tórgarð hevði góða leiligheit bæði tá og seinni til at protestera ímóti, at Jóannes Patursson fór til Noregs. Eg játtaði tí tá, og og vildi gjarna hava verið við. Nú kemur hr. Tórgarð og sigir, at einki er protokolfort, ja vit kundu jú haft eina protokol á fundinum, men vit hildu tað ikki nýtast. Fyrst ígjár kemur hr. Tórgarð fram við einum nýggjum plani. Hann átti at vera komin fram við honum, táið vit komu aftur úr Danmørk, men tá segði hann einki. Hann hevir yvirhøvur onganfið sagt okkum, at hann hevði ein betri plan og hansara innstillingur í

sakini undrar meg stórliga. Hr. Effersøe, at hann sær, at tað hevir verið ringt samarbeiði í nevndini; ja, nú siggi eg tað eisini, men har hevir eingin ósemja verið í nevndini, i hvussu er ikki í fleirtalinum, vit hava arbeitt ógviliga væl saman. Hvat ið viðvíkir tí at nevndin hevir engagerað ein ingeniør, utan at ministeriið hevir játtað, so er tað jú so, at hann er engageraður eftir at formaðurin í nevndini hevir munnliga vent sær til justitsministaran, og tað mátti verið nóg mikið; man kann ikki altíð trúgva, at ein maður hevir ein rev bak oyra, serliga ikki táið tað er statsministarin. — Tað er ikki meiningin, at henda fyritøka skal vera til gagns fyri Havnini bert, men fyri øllum Føroyum, og við tí endamáli havi og sitið her á løgtingi, og tað vil eg halda fram við at arbeiða fyri. So hevir verið talað um hvat ingeniøranir kosta tinginum; vit høvdu eina sak fyri kortum, at ein donsk kommissión rekvirerar eina føroyska kommissión niður til Danmarkar og har kemur so ein rokning uppá 5 000 kr. niðri frá fyri hesa ferð, og hesa rokning talar eingin um, bóast ein skuldi trúð, at táið Danir biðja tingmenn koma niður til Danmarkar at samráðast við teir, at teir so eisini betala ferðina av ríkiskassanum. Tórgarð helt tað vera løgið, at hesir verkfrøðingar, ið nevndin hevir engagerað, skuldu grannskað Fossá í Vestmanna og Sandá í Tórshavn, tí bæði støð hevði verkfrøðingar verið undan. Eg kann aldri frígera meg fyri tá hugsan, at hr. Tórgarð meinar, at Havnin skal hava einaratt uppá elektricitet í Føroyum. Hini plássini hava eisini krav uppá eitt sindur. Tað tykist eins og tað keinur an uppá, hvør ið stílar fyri fyritøkum her í Føroyum, hvat ið tí viðvíkur, hvussu tær vera dømdar. Nú er tað Jóannes Patursson og Rasmus Niclasen, ið hava stílað fyri hesum, og tí er tað galið. Eg meini kortini, at sakin er førd beint fram; eg meini at tað vit hava gjørt er rætt og at tað er gott.

H. C. W.-Tórgarð: Eg dugi ikki at fata, hví Rasmus Niclasen kallar mína frásøgn ein kritik, og eg skilji ikki, hví hann kann framføra sovorðnar persónuligheitir, sum hatta um Havnina og elektricitetina. Hann tykist at blanda hesa sak saman við eitt bónarbræv frá Havnar kommunu um avstáilsi av arealum. Eg haldi tað føra ov langt út at føra vitnir uppá telefonsamtalur; Rasmus Niclasen las telegrammið upp fyri mær í telefonini, tað var ganska vist á eingilskum máli, og eg kann tí kanska ikki hava skilt tað fult út, men eg hugsaði ikki um at fáa mær vitni; nú veit eg til eina aðra ferð, hvat ið eg eigi at gera. R. Niclasen talar um, hvat eg segði frá fundinum ígjár, eg haldi heldur ikki at tað var neyðugt at føra protokol yvir hann. Eg kenni einki til honda verkfrøðing, ið er komin higar til amtskommunumna, og havi einki sagt um hann persónliga. Men táið fleirtalslimirnir einki minnast, av tí sum var sagt, var tað betri um tað var ført til protokols. Patursson og eg komu ógviliga langt inn á munin millum norskar og íslandskar ingeniørar, og eg skal siga her, at útdanmilsi kann vera nakað tað sama, men tað er ikki ómøgiligt, at einstakur Íslendingur kann vera betri enn einstakur Norðmaður ella umvent.

A. Samuelsen: Sýslumaður Effersøe kritiseraði løgtingsviðtøkuna í vetur, og hann leiddi út, at nevndin ið var vald, í støðunum var gingin víðari enn løgtingsviðtøkan ásetti og á øðrum punktum hevði hon einki gjørt. Táið eg nú tosi um nevndina meiri og fleirtalið, ella rættari tann eina mannin í fleirtalinum, tí hin hevir bert sagt ja og amen til alt, hvat tann eini hevir gjørt. Tað fyrikom fleiri enn mær, at tað var gjørdur ein feilur at velja henda mann, J. Patursson, í nevndina, og enn meira velja hann til formann, tí øll vistu, at hann var so nær skyldur við eitt privat selskap við sama endamáli, at hann var nevndarlimur av Føroya handil og industri. Tað kann ikki forbjóðast honum at vera, men tað var at vænta, at táið hann kom í hesa nevnd, at hann ikki vildi standa heilt fríur, og tað vísti seg eisini. Hann tók til at arbeiða fyri løgtingsnevndina tann sama ingeniør, sum frammanundan var antikin av hansara selskapi. Eg skal einki ilt siga um henda ingeniør, men tað kundi ikki verið stórt óheldugari fyri okkum, enn at fáa netupp hann. Men annað var ikki at vænta, tá Jóannis Patursson var valdur í nevndina. Vit hava altso fingið ein mann herupp, og hann hevir engagerað tveir aðrar við sær; hann er frammanundan engageraður av einum privatum selskapi og hann vil sjálvandi arbeiða fyri teirra interessum. Tað er bert annar helftin av tingmonnum ið eigur ansvarið fyri hetta, nevniliga sjálvstýrismenn. Tað sæst einki í sakini um, at nevndin hevir vent sær til ministeriið fyri at fáa útreiðslurnar við hesari grannsking gottgjørdar úr statskassanum soleiðis sum samtykt var av løgtinginum. Eitt annað er, at einki er avgjørt um, hvat ingeniørarnir

skuhu hava í viðurlag. Hin eini hevir skrivað til løgtingið um: »at det væsentlig skal være i Overensstemmelse med de norske Ingeniørnormer, og Rejsegodtgørelsen skal godtgøres efter den norske Ingeniørforenings nugældende Takster«. Eg veit ikki, hvussu nógv hetta verður.

Tað vildi interesserað okkum at fingið at vita, hvat tað vil kosta. Heldur ikki hava vit fingið at vita, hvat tað hevur kostað, at kommissiónin hevur ferðast í Noreg. Eg eri glaður yvir, at vit hava fingið ein verkfrøðing her upp til at undirsøkja áir og vøtn, men lat meg fyritaka tað tankaeksperiment: hevði sambandspartiið fyritikið slíkt, sum vit her hava fingið greitt frá, so skuldu vit hoyrt eina gølu, ja ikki eitt av gølu, men nú! nú er tað bara tilsjutningur. Tó, tað kann ikki skaða at peika á, at henda sak er blivin lættsindiga behandlað, ja lættferdiga behandlað. Vit hava ikki fingið nakran berætning fyrr enn í dag, meðan vit kundu fingið hann longu í juni. Tað kundi alt verið fyritikið fyrr; brøvini áttu at ligið frammi á Ólavsøku. Berættningurin greiðir frá eini Noregsferð og bestendur av einum rapporti, dateraður í Bergen og Keypmannahavn í maj. Tað er interessant at hoyra hr. Patursson lesa berættningin og hoyra hann tala um kommission, og so hoyra vit, at kommissiónin bestóð av hr. Patursson einsamallum. Tingmaðurin í Kirkjubø sigur, at táið rapportin talar um kommission, so er tað tí, at tann sum rapp. hevur skrivað væntaði fleirri enn ein mann til Bergen. Men er so rapp. skrivaður framman undan? og tori ikki at siga, at rapporturin er skrivaður framman undan, men táið so er, so mátti »kommissiónins undir øllum umstendigheitum kunna rættast, men eitt vil eg siga: er alt í hesum rapporti líka so missvísandi sum úttrykkið »kommissiona, ja so er rapp. ikki at líta á, og er tað sum í hesum berættningi er frágreitt um fossanevndina líka so móttvísandi sum rapporturin, er tað ikki at líta á, og eru bílagini líka so missvísandi sum berættningin, so er tað *forferdiligt*. Tað fyriliggur í sakini nakað um ein landsplan, sum verkfrøðingurin hevur sent til fossadirektørin í Kristiania. Direktørin skrivar so í síni erklæring, at hesin planur ikki kann kallast nakar landsplanur, tí tað er bara »visse generelle Regler, der gælder for al Kraftforsyning«. Hesin planur, sum altso ikki er »nogen plan«, sum manglar allar berokningar, ið eitt verk skal byggjast uppá, er tað so vit skulu taka fyri góðar varur sum »Landsplan«. Hesin sami vasdragsdirektørur, ið er ein viðgitin maður, skrivar netupp í brævi til verkfrøðingin, sum kommissiónin hevur engageraða: »De vil være enig med mig i, at den tilsendte Plan ikke kan kaldes en Landsplan«. — Eg skal ikki leggja meira aftrat, tað frangongur alt av dokumentunum, sum J. Patursson hevur lagt fram. Vit vita, at harra Blauw er engageraður av einum privatum selskapi, og at harra J. Patursson sjálvur er í bestýrilsinum fyri hesum selskapi, »Føroya handel og industrie«, ella er hann tað ikki nú, so hevur hann verið tað.

Tað letur til, at tað, direktør Kristenson hevur sagt um hendan plan hevur fallið verkfrøðinginum fyri bróstið. Hann sýnist nú at forklára tað so, at tað ikki kann nevnast landsplanur av tí, at ikki allar oyggjarnar kunna koma inn undir. Direktøren forklárar tað ikki so, hann sigur, at allar neyðturvuligar berokningar mangla.

Eg loyvi mær at stilla tann positiva spurningin til tingmannin úr Kirkjubø, um hann hevur syrgt fyri at fáa at vita, hvat vit skulu betala. Hevur hann fingið at vita, hvat fyrisett er, at verkfrøðingar skulu hava í lm? Tað stendur í brævi frá harra Blauw, at vit skulu betala eftir teimi fyrisettu takstum, ið ern galdandi fyri norskar verkfrøðingar. Kann tingmaðurin úr Kirkjubø vera einigur við mær í, at vasdragskommissiónin hevur behandlað hesa sak lættsindiga og lættferdiga? Tó tað er ikki stutligt at spyrja harra Patursson, hann svarar jú altíð í eystan, tá eg spyrji í vestan.

So vil eg spyrja Patursson eitt enn: hevur hann fingið at vita, um staturin vil betala helvtina av útreiðslunum, um staturin hevur lovað at betala helvtina av tí rokning, sum J. Patursson olla vasdragskommissiónin skrivar? Hevur hann ikki tað, hevur hann verið lættsindigur.

Eg eri einigur við R. Niclasen í, at hesar ransókuir vilja verða til gagn fyri allar Føroyar. Ein sigur, at forsýnið tekur sær av tolm, ið bera seg óvitiga at, men harfyri mugu vit tó ikki vera óvitug, og í hesi sak er tað borið seg óvituga (óforsuftiliga) at. Vit hava triggjar verkfrøðingar, tó kommissiónin bara hevði bemyndigilsi til at engagera ein mann.

Tað er skeivt at læta verkfrøðingarnar sjálvar bestemma. Tað eru vit sum skulu hava loyvi at bestemma. Og tá tingið ikki er saman, so er tað amtmaðurin á tingsins vegna. Hevur nevndin vent sær

til amtmannin og biðið hann avgjørt tann spurning um hvussu nógvar verkfrøðingar, vit skulu hava? Um nevndin olla nevndarformaðurin hevur fingið játtilsi frá tinginum olla amtmanninum, so er tað gott. Hevur amtmaðurin ikki approbera hetta, so er tingið sett út av spælinum og norska verkfrøðingsfelagið er komið ístaðinfyri. Eg eri góður við Normenn, men teir skulu ikki ráða hor. R. Nielsson meinti, at vit kritisera so nógv at vit lata pengar. Eg gangi út frá, at hesar 3 000 kr. hevur nevndin ella aðrir fingið. Annars skuldu vit hava kritiserað pengarnar til teir menn, sum fóru til Keypmannahavnar í landbráksskúlamálinum, sigat tað. Vit mugu bíða við tí til tann søk kemur fram. Hann sum hevur haft vitni, má vera klókari enn Jákup Sibbi sum einki vitni hevði við sær. Tó er tað ikki pent at hava vitni sum annar parturin ikki veit av. Men hetta man vera hent av tí, at samarbeiði í kommissiónini ikki hevur verið gott. Eg sakni nógv í frágreiðingini, tó at hon er long. Tað vesentligasta vantar. Og um tingmaðurin í Kirkjubø hevur hildið sína langa røðu, so vita vit einki av tí, sum vit ynskja at vita. Vit hava hoyrt um blíðskapin í Noreg. Tað kunnu vit ætla. Og so hava vit hoyrt, at man ikki hevur haft pass. Ja, tað er við gáloysi gingið fram hjá tingmanninum í Kirkjubø undir hesum arbeiði. Men tosann kemur hann frammanundan og teir menn, sum hava sett hann hava ansvarið fyri honum. Vit kundu ikki forða fyri tí, og vit loggja skyldina á meirilutan her í salinum. Tó vóni eg at vit fáa nakað burtur úr hesi sak. Eg haldi at vit annars vilja vera við nú at fáa so gott burtur úr sakini sum gjørligt er. Men eg kann ikki halda aftur beklagilsi av at solciðis er gingið til.

J. M. Matras: Tað stendur viðvíkjandi tey støð, sum eru undirsøkt, at í Norðoyum er einans rannsókn gjørd av eini á í Klaksvík. Tað eigir eisini at verða farið í hinar oyggjarnar. Á Viðoy er oin nakað stór á, og tað eru aðrar áir á Borðoynni eisini, og so er tað streymurin í Hvannasundi. Í Svínoy eru eisini nokk so stórar áir. Fugloy viðvíkjandi dugi eg ikki at siga nakað vist. Eg vil næma til at hesir menn ferðast til hesar árnar og eisini til Kunoynna og Kalsoynna.

J. Patursson: Eg vil vísa hetta málið til fossanevndina og síðani seta framm uppskot um privatan fund seinni ídag, hvar verkfrøðingurin kann koma til og geva yvirlit um, hvat hann hevur gjørt.

M. Samuelsen: Eg vil siga nøkur fá orð viðvíkjandi at nevndarformaðurin segði, at tað generella undirsøkilsi er ondað. Eg helt at tingið hevði biðið um eitt almindiligt undirsøkilsi. Um hetta er tað almindiliga undirsøkilsi, so kann eg ikki forstanda, hví verkfrøðingarnir stríka fram við ymsum kommunum utan at bera við. Tað er til dømis Víkar sókn; har hava teir ikki undirsøkt. Vit hava har tvær áir, sum hava líkindi til at kunna útnyttast. Har er Fossá; tað skal vera undarligt, um hon einki nyttar. Eg vil vóna, at hesir frammandi menninir ikki fara av landinum utan at hava ferðast viðari; annars vil eg beklaga nevndina. Hon er at beklaga á so nógvar máta.

Formaðurin: Jeg vil besvare Spørgsmaalet fra A. Samuelsen benægtende.

O. Effersøe: Patursson mente, at det paahvilede Amtmanden at ansøge om Udgifterne fra Statskassen. Mindretallets Forslag gaar ud paa, at det er Tinget, som skal foretage noget. De fire første Punkter gaar ud paa, at Tinget skal foretage noget bestemt. Men dette blev forhindret ved det Forslag, som kom fra Udvalget. Medens Mindretallets Forslag i Fjor handlede om, hvad Tinget skulde foretage sig, handlede Forslaget fra Flertallet, der blev vedtaget, mest om, hvad Udvalget skulde foretage sig. I Punkt 1 staar der om Oprettelsen af et staaende Udvalg, i Punkt 2 og 3 om, hvad Udvalget skal foretage sig, i Punkt 4 om Midlerne til Udvalgets Fungering, og naar det saa i Punkt 5 hedder: »Tinget andrager Ministeriet om, at Halvdelen af Udgifterne til foranstaaende Formaal afholdes af Statskassen«, saa staar her ganske vist: »Tinget andrager«, men det er et Spørgsmaal, om det ikke skal forstaas saaledes, sammenholdt med de øvrige Punkter, at det bør være Udvalget, der retter denne Henvendelse til Ministeriet. Der er imidlertid intet saadant sket. Hvad Ingeniørernes Omrejse angaar, skal jeg begrænse mig til at sige, at jeg finder det mærkværdigt, at da der kommer Ingeniører til Suderø, at de saa ikke henvender sig til mig, som dog er gammel Lagtingsmand og i Fjor var Medlem af dette Udvalg. De var væk igen, inden

jeg vidste af det, og jeg fik derfor ikke Lejlighed til at tale med dem om, hvad der kunde gøres vedrørende denne Sag i Frodebø Sogn.

J. Patursson: Eg má halda tað vera beint, at tingið heldur seg til tess, tað heldur vera formelta beint, eftir okkara tingskipan eftir punkt 5 er tað eingin ivi um, at tað er amtmaðurin, ið skal andraga um hetta.

Málið var beint í millumtinganevndina.

Fundur mánadag 11. august.

Broyting í bygdaskúlaskipanini.

1. viðgerð.

S. P. úr Konoy: Tað er jú tinginum kunnugt, at henda sak um broyting í skúlaskipanini var til viðgerð í fjør, og at tað bleiv viðtikið í tinginum, at føroysk børn skuln læra at skriva føroyskt mál í øllum skúlum, og at undirvísingarmálið skal vera føroysk.

Ministeriið er villjugt til at ganga við til at broyta § 7 í skúlaanordninginum um undirvísingarmálið, men vil av nýggjum hava úttalilsir frá løgtingi og skúladiroktión, áðrenn teir gera nakað. Tað spyr um, hvussu vítt eitt barn í 12 ára aldri vil vera búgvið í teim ymissu skúlagreinum í forhold til onnur, tá tað skal hava sína læru við føroyskum til undirvísingarmál.

Teir ið styðjaðu hesa sak í fjør, hava ikki broytt teirra hugsan, teir standa á sonn støðu sum fyrr. Fyri mær er hesin spurningur ein principspurningur, og eg vil í hesi søk vísa á míni úttalilsir í fjør. Eg mæli til, at sakin aftur nú fer til kirkjukassanevndina.

Joen Poulsen: I Fjor, da Sagen kom frem her i Tinget, udtalte jeg baade paa mine egne og paa mit Partis Vegne, at vi var villige til at forhandle om Sagen, men der syntes ikke at være Stemning for nogen Forhandling, Sagen skulde vedtages, som den forelaa, uden nogen Forhandling, og det lykkedes ikke at opnaa Enighed, hvad jeg fra først af havde ventet.

Jeg synes ikke, der er noget særdeles mærkværdigt i det, at vi faar en Sag tilbage fra Ministeriet; det er jo noget, der ogsaa hænder andre Steder, i Rigsdagen mellem begge Ting og mellem et af Tingene og Ministeriet, naar man ønsker fyldigere Oplysninger om en Sag. Det er derfor ikke mærkeligt, at vi faar en Sag tilbagesendt. Saadan som Ministeriets Skrivelse foreligger, fremgaar det, at man vil have nøjere Oplysninger. Der er et gammelt Ord, der siger: »ja og nej giver lang Trætte«, derfor maa man, hvis man vil have en Sag frem, komme med Oplysninger og ikke bare sige *ja* og *nej*.

Naar der er Tale om, hvilke Oplysninger, vi kan skaffe frem her, saa kan der tænkes flere Slags.

Angaaende Tilsyn med vore Skoler, saa rejser Provsten omkring og tilser Skolerne. I den sidste Tid har vi været udsat for dobbelt Provsteskifte, saa den nuværende Provst er ny i Embedet og har endnu kun haft ringe Lejlighed til at sætte sig ind i Forholdene. Desuden har Direktionen aarlig udsendt Folk til at inspicere Skolerne, og disse Mænd har ogsaa udsendt Beretning. Et saadant Besøg varer kun kort, saa vedkommende ikke altid faar Tid til en grundig Undersøgelse. Derved kan det Skøn, man har dannet sig, blive af forskellig Værdi, men mange Gange kan det være rigtigt. Dog tror jeg, at mange af disse Beretninger har været af fortrolig Art og ikke bestemte til at fremlægges offentlig.

Men jeg tror ikke, at disse Beretninger vil afgive noget Bevis for, hvordan Tilstanden vil være, naar der kun skal bruges eet Sprog. — Der er ved hver Skole udarbejdet Skoleplaner, og de har altid været approberet af Skoledirektionen. Deraf vil man faa at se, hvor mange Skoledage hvert Barn har. Baade hvor en Lærer har een Skole og hvor Læreren har flere Skoler indenfor sit Arbejdsomraade, man det være vel muligt at faa Oplysninger om Børnetal og Klasseinddeling, om, hvor mange Dage hver Klasse har og om, hvor mange Dage Læreren har ved hver Skole, ligesom det kan oplyses, hvor mange Skoledage, der normalt bliver til hvert Barn. — Hvor en Lærer har flere Skoler, kan Forholdet blive det, at nogen Tid gaar tabt. Vel er det saa, at Læreren gerne rejser om Eftermiddagen, men Forholdene kan medføre, at vedkommende bliver nødt til at bruge en Del af Skoletiden til sine Rejser. Jeg tror, at alle saadanne Oplysninger vil gavne, og jeg

vil derfor anmode Udvalget om at faa Sagen belyst saa godt som muligt ved at samle saa fyldige Oplysninger her, som gøres kan. — Der er jo nogle Fag, hvori der *skal* undervises og andre Fag, hvori der *kan* undervises. Jeg vil henstille til Udvalget at faa fremskaffet Oplysninger om, hvorledes det forholder sig i den Henseende i de enkelte Skoler. Sagen er foreslaaet henvist til Kirkekasseudvalget; jeg skal ikke anbefale at vise Sagen anden Steds hen; jeg gjorde det i Fjor, men mit Forslag blev ikke taget til Følge.

S. P. úr Konoy: Eg hevði ikki ætlað at biðja um orðið, men J. Poulsen rørir við ymissar spurningar, so og má siga nøkur orð. Eg fati ikki, hví J. Poulsen sigur, at tað ikki var stemningur fyri forhandling. Nevndin vísti forhandlingsvilja, tí vit forhandlaðu í nevndini um hetta mál, og vit vóru allir samsintir, og nevndarlimurin úr hinum partinum var samsintur við okkum. Tá tað kom til undirskrivingar, skrivaði hann undir við »forbehaldo, og tað er jú einki at siga til. Eingin kann siga, at fleirtalið ikki vildi forhandla. Eg sigi tað ikki fyri at mótmæla, men fyri at rættleiða. Til teir rættleiðingar sum minnihlutarin leggur okkum á sinni, vil eg siga, at allir vilja at upplýsingarnir skulu vera so nógvir sum møguligt. Nevndarformaðurin er ikki nú tilstaðar, men eg kann tó her eisini tala á hansara vegna. J. Poulsen talaði um prógtin sum tilsýnshavandi, at hesin maðurin ikki kendi so nógv til skúlarnar í Føroyum. Men hann hevur tó verið í nógvum skúlum, sjálvandi fyrst og fremst at byggja eftir skúlahúsunum, tí tað er hann jú settur til. Kanske hevur hann ikki prøva børnini so nógv. Tað hevur verið ein merkligur máti, sum fyrr hevur verið nýttur, at vissir menn hava fingið bestemt noktandi avslag til at fáa at vita, hvat skúlakommissiónin hevst at. Eg vildi tí, at J. Poulsen hevði gjørt sína atlinning fyri 3—4 árum síðani. Viðvíkjandi skúlaplaninum, so skal hann útarbeiðast av skúlakommissiónini, skúladirektiónini og kanska ministeriinum við. Tað undrar meg, at J. Poulsen leggur so nógva vekt á aðrar spurningar, t. d. um hvussu børn møta í skúlunum. Hann hevur gloymt at vit lærarar skulu í hvørjum fjórðingsári siga, hvussu nógvir skúlapliktigir dagar eru og hvussu nógv børn ið koma í skúla o. s. fr. e. Og eru børn burtur frá skúlanum, so skulu vit siga hví tey eru tað. Hesir upplýsingar eru tilgangiligir fyri hvønn og ein. J. Poulsen kann eisini fáa frágreiðingar úr teim »statistisku beraetningum«, sum nú vera útgivnar.

Joen Poulsen. Den sidste Taler og jeg er enige i Hovedsagen, nemlig angaaende at skaffe Oplysninger. Det hænder jo alle Vegne, at Børnene eller Læreren ikke kan komme i Skole paa Grund af Sygdom. Naar jeg nævnte, at den nuværende Provst ikke var saa godt inde i disse Ting, saa var det, fordi jeg mente, at han endnu ikke havde haft saa god Lejlighed til at sætte sig ind i Forholdene. Det var ikke for at fornærme Provsten. Det kan ikke nu hjælpe at tale om, hvorvidt der var Forhandlingsvillighed til Stede i Fjor eller ikke. Vi har dog heldigvis haft for Skik at offentliggøre Udvalgsbehandlingerne. Ja, der blev sagt en Del, men jeg fik ikke det Indtryk, at Flertallet vilde modtage nogen som helst Rettelse. Der fremkom jo Ændringsforslag, men dem vilde man ikke have.

O. Effersøe: Jeg kunde være tilfreds med, at de to sidste Talere er enige i Hovedsagen, da jeg ogsaa er enig i, at der bør skaffes Oplysninger. Jeg vil henstille til det Udvalg, som faar Sagen under Behandling, om at dette faar Oplysninger, som ligger udenfor det normale. Spørgsmaalet er, om det unormale er det normale.

S. P. úr Konoy: Tað kann vera, at eg eri nakað dulur. Men eg skilji ikki hasa definisjónina hjá Effersøe.

O. Effersøe: Jeg vil da udtrykke mig anderledes. Spørgsmaalet er, om det, som er gældende Bestemmelse, bør blive Reglen eller blive Undtagelse.

S. P. úr Konoy: Um harsiktast til undirvísning í donskum, so verður tað undirvíst í donskum. Tað er vist tað normala, at børnini møta í skúlanum. Nokur biðja seg frían, men tað eru nóg so strong bestommilsir her. Tað er nær um at siga beundringsverdugt, at foreldur hava sent børn sín so nógv í skúla í hesi tíðini; tí 10 oyrur í sekt er einki nú.

O. Effersøe: Ja, det er just Skolegangen, jeg sigter til. Hvad Skolen er bestemt til at præstere, saa kommer det ikke an paa, hvor mange Børn der undervises, men det kommer an paa, hvordan Undervisningen bliver givet.

Formaðurin: Der er fremsat Forslag om Sagens Overgang til Kirkekasseudvalget.

Samtykt varð at beina sakina í kirkjukassanevndina.

Havnar kirkjugarður.

1. viðgerð.

Edv. Mortensen: Sum tingmenn minnast var sett millumtinganevnd í hesi sak. Nevndin hevur haft fund og hevur roynt at tingast við ánararnar av stykkjum sum liggja rundan um kirkjugarðin. Tað gekk ikki so væl. So hevur nevndin valt ein mann, sum skal vurdera jørðina. Teir komu til tað, at jørðin var 1½ kr. verd hvør kvadratalin. Tað eru 6000 □ alin; so verður tað 9000 kr. Um kirkjukassin fyri Suðurstreymoy skal gjalda hetta, so verður tað føliligt fyri hann. Tí hann hevur einki annað enn skuld, og tað vil gera hansara status enn verri enn hann er áður. Viðtøkan hjá tinginum ífjør var at kirkjukassin skuldi betala. Vit hava tí hildið, at tað var beinast at sakin kom framm aftur á ting. Ein annar spurningur er: Er kirkjukassin pliktaður at betala fyri hesa grund? Eg vil mæla til, at sakin fer í kirkjukassanevndina.

H. C. W.-Tórgarð: Eg havi ikki størri at leggja til. Eg havi gingið við til at bera sakina framm aftur á ting. Eg eri samsintur í at kirkjukassin er pliktaður at betala grundina. Eftir teimum henvendilsum sum eru gjørdar frá tinginum og nevndini til Havnar býráð, vil tað ikki góðviljuga betala útreiðslurnar. Kanske tó grundin kann fáast fyri einki við tað er kongsjørð. Eg eri samsintur í, at sakin fer til kirkjukassanevndina.

Sakin varð beind í kirkjukassanevndina.

Akvegur í Skúvoy.

1. viðgerð.

M. A. Winther: Undir kríggum var mangt og hvat samtykt her á tingi, m. a. fyri at bøta um arbeiðisloysi, og eitt, vit gjørdu, var at lova studning til tær kommunur, ið tóku sær uppá at leggja akvegir, táið hesir vegir vóru meira privatir, t. d. burtur til torvheiðar o. l. Vit samtyktu tá hvussu stóran part vit skuldu geva av tingsins kassum, og var tað ásett, at vit skuldu geva imtil 100,000 kr., móti at kommununrnar lótu hartil svarandi 50,000 kr. og staturin eins nógv, altso fjórðingin av øllum peningunum. Frá næstan øllum bygdum í Føroyum komu umsóknir, sumar um heldur langar vegir, t. d. ein frá Sandsbygd til Søltuvíkar, aðrar um stykki. Vit høvdu av fyrstan tíð roknað við 30 oyr í tímaløn, men seinni, táið tíðirnar dýrkaðu enn meira, sýnti hetta seg at vera ov lítið, og vit samtyktu tá at hækka studningin við 30 pct., undir forútseting av, at staturin og kommununrnar hækkaðu eins nógv. Nú eru aftur komnar fleiri umsóknir til tingið, millum annað henda úr Skúvoy. Tað er nú ein spurningur, um vit skulu halda við og royna at fáa ministeriið til at geva sama studning sum higar til alla vit skula stedga, og bíða til vit siggja hvussu teir vegir, ið enn eru í gerð við studningi frá løgtingi, verða gjørdir. Eftir mínum tykki hevir løgtingið ikki gjørt nakað betri enn hetta, tí nú hava kommunustýrini fingið eyga upp fyri hvussu neyðsynt tað er at gera akvegir. Eg skal bert taka til, hvussu tað er í mínum valdømi, í Sandoy, har hava menn til fullnar skilt, at skal jørðin dyrkast sum hon eigur, skal nýlendi kunna leggjast inn og gamalt lendi dyrkast sum tað eigir, um ein skal kunna koma lættliga eftir torvi o. s. fr., so mega vit hava akvegir. Ein maður kann arbeiða 100 pct. av slíkum arbeiði meira um árið í somu tíð sum nú, táið vit hava fingið nógvar slíkar vegir. Hesa umsókn frá Skúvoyingum nýtist mær ikki at anbefalla meira enn nakra aðra hóast eg skuldi verið serliga sinnaður til at hjálpa teimum, men hetta er bert ein umsókn av einari rúgvu, og eisini mega vit helst siggja hvussu teir vegir verða gjørdir, ið vit longu hava játtað pening til; tað er upplýst, at summastaðni er arbeiðið ikki so gott gjørt sum ynskiligt. Eg vil mæla til, at

sakin fer til figgjarnevndina. Tað ið staturin gav tá ið vit byrjaðu hesa vegabygging, var ein dýrtíðarhjálp, men halda vit nú áfram, má tað vera undir øðrum formum, og studningurin má gevast sum studningur til vegabyggingar yvirhøvur. Tað er komið ein onnur sjón uppá vegir og nyttu teirra í Føroyum nú, so og vildi fegin hoyrt, hvat tingmenn halda um hetta mál, hvat vit skulu gera, antin ikki fara undir nakað nýtt, fyrr enn alt tað ið er byrjað undir teim gomlu treytunum er liðugt, olla vit skulu halda fram við tað sama á sama hátt sum nú. Tað er harmiligt fyri teir menn, ið eru lidnir við at gera vegir teirra, at bíða tí aðrir ikki hava verið so skjótir, men her mega vit hava fastar reglur, og bróta vit tær fár, so mega vit eisini bróta tær næsta ár. Eg skal aftur mæla til, at málið fer til figgjarnevndina.

O. Effersøe: Vejsagen har været diskuteret offentlig og behandlet af Lagtinget, Rigsdagen og forskellige Myndigheder i en Del Aar. Jeg skal nævne, at vi har haft Undersøgelser i Marken, vi har haft en norsk Ingeniør heroppe, Hr. Horn, og hans Beretning har foreliggget for Tinget, vi har siden haft Ingeniører heroppe fra København, og sidst har vi haft en her paa Øerne boende Ingeniør, som har haft god Forstand paa Vejanlæg. Forstaaelsen af Vejenes Betydning er vokset i de sidste Aar. Vi har faaet Løfte fra Regeringen og det er slaaet fast ved Bevillinger af Rigsdagen, at Staten vil betale de 4 Femtedele af Bekostningen ved disse Vejanlæg og den paagældende Kommune slipper med en Femtedel. Vi har faaet en saadan Vej, nemlig fra Sand til Skopen. Samtidig ydede Lagtinget Tilskud til Veje af mindre Betydning. Vi gav et fast Tilskud, der svarede til 50 Øre pr. Favn. Imidlertid medførte Krigen, at man foretrak at fremme Vejanlæg ved en Dyrtidsforanstaltning, og det blev de kommunale Vejanlæg, der blev begyndt med. Herved blev der bedre Mulighed for Anlæg af disse Veje, og der er fra Statens Side givet Tilsagn om et betydelig større Tilskud end sædvanligt til lignende Foretagender. Jeg mener, at vi bør fortsætte paa den nuværende Maade, selv efter at Krigen er hørt op. Vejsagen er af ualmindelig stor Betydning for os, og det er netop nu Tiden til at gaa fremad. Disse Smaaveje vil ogsaa faa mest Tilslutning fra Befolkningen, og jeg vil derfor være meget tilbøjelig til at yde disse Veje Tilskud, saaledes at Lagtinget støtter dem som hidtil, og at man hos Regeringen søger om det hidtidige Tilskud. Vi har al Grund til at vente, at man fra Regeringens Side vil stille sig særlig velvilligt. Hvorledes Sagens Gang skal være, er jeg mest tilbøjelig til at anbefale, at man gør disse Veje, der er sat i Gang under Krigen, færdig, inden man gaar til noget nyt. Det er dog en Masse Vejanlæg, der er blevet søgt Støtte til, lad os se at faa dem fra Haanden, inden vi fortsætter. Det kan være, at Sagen ikke bør udsættes længere end til næste ordinære Lagtingssamling. Vi bør have ordnet os saaledes, at vi straks kan fortsætte. De projekterede Vejanlæg vil vist ikke være tilendebragt før Udgangen af 1920.

Der blev fremsat et andet Forslag, nemlig hvorvidt man skal sætte sit Tilskud op til de Veje, der er besluttet at bygge, de saakaldte Krigsveje. Jeg maa anse det for naturligt, at man venter hermed f. Eks. til Udgangen af 1920, til vi kan se hele Spørgsmaalet fuldt ud belyst. Der kan jo være nogen Anledning til ikke at forøere nu, da Daglønnen er saa høj, det var maaske bedre at vente til Lønningerne vil falde, hvad de vel gør i nogen Grad, og Anlægget derved bliver i al Fald *noget* billigere.

J. H. Poulsen: Alt tað, her er tosað í dag, er komið av tí sak, ið er frumkomin fra mínum valdomi. Tað kundi verið orsok fyri meg til at standa upp og mæla til hesa sak, og havi alltíð verið glaður, tí vit hava kunna fremja vegsakina í Føroyum. Tað var jú meiningin, at hvsir vegir skuldu hjálpa uppá dýrtíðina, tó teir hava ikki allastaðni virkað so. Mangastaðni hava menn ikki gjørt nakað við arbeiðið sjálvir, men fingið fólk aðrastaðni frá. Tó er tað so, at tað er gott, at verkið kom í lag, tí høvuðssakin fyri nurr er, at teir hava fingið vegir. Teir, ið talað hava, eru á einum máli um, at tað er best at bíða, og eg kann siga, at eg eri samsintur við teim í tí. Tað er kann henda beinast at stødga, at anda eitt sindur, tó at eg moguligvís kann venta at fáa á nakkan fyri mína støðu her, tá eg komi heim aftur. Tað er beint, at vit fáa eitt yvirlit, áðrenn vit ganga víðari, og eg gangi tí við til, at vit stødga við hesi sak so leingi, og eg kann vera samsintur við Effersøe í, at vit bíða til útgangin av 1920. Eg vil antaka, at anleggini eru útført til

ta tíð, tó meini eg ikki, at vit skulu vera so strangir, at siga at tey *skulu* verða liðug til ta ásettu tíð, vit kunna umroða hetta í komandi samling.

Tað er misjavnt, hvussu forstáilsi er hjá fólki vegsakini viðvíkjandi, tó veit eg, at vegarbeiðið er komið vel við, tó eingin innloga hevur verið. Tað er einki at siga til, at fólk fer til tað arbeiði, ið gevur mest av sær, og tá fiskiveður er og nógv er at fáa á sjónum, fer fólk ikki til vegarbeiði. Hjá okkum hevur tað verið soleiðis, at vegarbeiðið er útfort, tá ikki útróðraveður er. Eg kann ganga við til, at vit ikki nú fera undir nýbevillingar.

J. Patursson: Effersøe spyr, hvonn máta vit skulu brúka til frama av vegsakini.

Tann mátin sigur okkum líka straks, at tað vil standa nógv á tinginum, hann vil krevja stórar útreiðslur. Eg dugi ikki at siga tað vist, tó verður tað ikki at kunna roknast stórt undir 50,000 kr., og hvar skal hesin peningur koma frá? Skulu vit fylgja tí máta, at løgtingið skal geva helvtina, og skal tað styðja umsóknir frá øllum bygdum, so er ikki gott at vita, hvaðan peningur skal fáast. Vit mugu vita, hvat vit skulu fáa inn fyrí tað, vit lata út. Eg eri glaður yvir, at Effersøe í dag er samsintur við meg; tó var tað betri, um hann hevði verið tað fyrr, tí so hevdu vit fingið vegir bíligari enn nú. Dagløunirnar eru høgar nú, tær eru gingnar upp síðan í fjør, og vit kunna ikki blíva við at byggja vegir fyri 10 kr. um dagin. I 1905 vóru tær ikki so høgar, tá gjørdist arbeiðið fyri o. u. 2 kr. um dagin.

Eg vil framhalda eina sak, eg longu hevði frammi í 1904, tað er, at vit sakna eitt vegstýri, tað teir hava alla aðra staðni. Eg vil biðja tiggjarnevndina virka fyri, at vit fáa eitt slíkt stýri, tí tað gongur ikki væl at arbeiða hjá tinginum fyri vegmálinum, tá einki vegstýri er. Fyrsti maður herí eigur at vera ein verkfrøðingur, ið hevur fingið sítt útdannilsi í Noreg. Vit hava ein mann, men hann er ikki kømur við vegbygging har, og tí var tað vert, at hann hevði fingið studning, so hann kundi fara til Noreg.

M. A. Winther: Tá vit til næsta ár skulu hugsa um hesar spurningar, sum Patursson hevur borið fram, er tað eitt, ið liggur fremst, tað er spurningurin, hvussu vit skulu greiða tað við peninginum. Eg føli meg vissan í, at vit eiga at fara tann veg at fáa eina skattalóg. Gera vit ikki tað, kemur tann tíð, at vit bliva at standa fastir. Vit mugu fáa eina skattalóg, sum er bygd á teimum princippum, sum skattalógir eru bygdar á aðrastaðni, og á hesum grundalagi var tann skattalóg bygd, sum vit seinasta ár logdu uppskot um fram á ting. So sum nú er statt, dugi eg ikki á at skyna, hvussu vit skulu fáa balance við teim inntøkum, sum vit kunnu fáa eftir teimum reglum, vit krevja skatt eftir. Eg havi tí einki ímóti, at tað verður niðursett ein kommissión at umhugsa hatta mál, og vóni eg, at sambandsmenn ikki eru ímóti hesum, og at vit fáa eina skattalóg. Eg vóni, at hetbar eydnast okkum, og dugi eg ikki at vísa annan veg. Eg haldi ikki sum Effersøe, at vit gjognum amtsreparti-tiónsfondin fáa tær inntøkur, okkum tørvar, men her hava Effersøe og eg verið miss-javnir í hugsan, tó tað er ónýtt í dag at tosa meiri um hetbar.

Tað eru pengar millum fólk í Føroyum, og vit eiga at nýta tey góðu árini fyri at fáa pengar at styðja hesi nógvu mál, sum fólkið í Føroyum ynskir framd. Tað er nakað vekjandi fyri fólk at vita, at tað gevur sjálvt fyri at fremja tær sakir, ið treingjast.

Tá eg haldi, at vit kunnu arboiða víðari í vegmálinum, sum vit nú hava byrjað, so er tað tí eg líti á at vit skulu fáa pening gjognum ein natúrligan beskatning og ikki einans ígjognum amtsreparti-tiónsfondin. Kundi tingið samsint gingið til bevillingsmyndigheitirnar, so kundu vit fingið samtykt í hesum. Vit vita, at vit nú ikki kunnu rokna við nokrum inntøkum eftir ekstraordinerum veg. Tað verður ivuleyst til einkis at orðaskiftast um, hvussu vítt hettar er ein góður máti, vit nú hava til at fáa pening. Men í longdini kunnu vit ikki nýta hendan mátan. Tá tað kemur til at vit skulu nýta t. d. 100—200,000 krónur, tá kunnu vit ikki nýta hendan mátan.

O. Effersøe: Patursson og Winther rejste Spørgsmaalet om at tilvejebringe Midler til Fremme af Vejsagen. Jeg er villig til at virke med til at man paa bedste Maade bestræber sig for at tilvejebringe disse Midler. Ved Hjælp af Amtsrepartitionsfonden er man i Stand til at tilvejebringe nok saa betydelige Midler. Denne Maade er god, om ikke ideel. Man bør derfor finde en bedre Beskatningsmaade, og jeg vil gerne deltage i Forhandlingerne derom. Men den Maade, man talte om i Fjor, er ikke god. Der er noget galt ved den. Jeg vil holde paa, at vi udviser Sparsommelighed. Og jeg er ogsaa sindet til at holde

paa, at vi ikke gaar over til en anden Beskatningsmaade, som der har været saa megot Tale om, nemlig Beskatningsmaade gennem Toldafgifter. Men at finde andre Maader har min Sympati. Naar vi nu har Udsigt til, at vi kan fremme visse Vejanlæg med Tilskud fra Tinget, saa er det, fordi mit Parti gennem de forløbne Aar har udvist Sparsommelighed og ikke har lagt stærk Beskatning paa Befolkningen. Vi har villet, at vi skal være forsigtige med at fremme dyre Formaal, for at ikke andre mere vigtige Formaal skal gaa istaa. Naar nu vigtige Vejanlæg skal fremmes, saa er det godt, at vor Skatteevne ikke er bleven belastet. Det kan siges, at vi har gaaet for langsomt frem og har været for sparsommelige; men dette har ogsaa sine gode Sider. Det er rigtigt at føre Politik i Samklang med Befolkningens Opfattelse, og i Befolkningen er der ingen udbredt Tilbøjelighed til at blive beskattet. Imidlertid — hvis det skal være os muligt at fremme Formaal, som koster mange Penge, og hvis det skal lykkes os at fremme Vejsagen paa bedste Maade, saa er det betydningsfuldt, at vi bortkaster den ørkesløse Politik, som er rejst af d'Herrer. Lad os være fri for den ørkesløse Strid om Forfatningsspørgsmaal. Den Stilling, som Mindretallet har indtaget, er af den Art, at ingen Strid kan rejses paa den. Patursson kom frem mod det, som han plejer at komme frem med: »Jeg forstaar Tingene, men Effersøe forstaar intet«. Han siger, at jeg ikke har forstaaet Vejsagens Betydning. Jeg har haft Forstaaelse derpaa og har det forud for Patursson, at jeg har faaet den bedste Maade til at fremme denne Sag paa. Jeg har fremskaffet Betingelser for at faa gode Veje, uden at det bliver altfor kostbart. Jeg roser mig ikke deraf, men jeg fremsætter det overfor Udtalelser fra Patursson. Med Hensyn til Spørgsmaalet om at faa en Vejlov, vil jeg deltage i Forhandlingerne derom. Jeg er af den Mening, at vi med den sagkyndige Bistand, som vi i Øjeblikket har her paa Øerne, meget vel er i Stand til at fremme Vejsagen. Vi trænger maaske til en Ingeniør anden Steds fra. Men naturligvis, naar Staten skal yde Tilskud, saa maa Ingeniøren repræsentere Regeringen.

M. A. Winther: Vit koma her nakað langt burt. Tað verður ivaleyst seinni í tingsamkomuni talað meir um okkara finansiellu støðu. Vit skulu soleiðis í ovurmorgin forhandla um okkara økonomiska status; tá verða líkindi til sovorðið orðaskifti. Annars talar Effersøe ídag ódrúiliga um hendan spurningin. Tá Effersøe skjýtur uppá at nýta sparsemi, so eri eg samsintur við hann. Tað skal vera okkara hugsan altíð. Men hvat er sparsemi? Eg haldi, at Effersøe ofta misfatar hottar orð. Effersøe sigir, at tað ikki er lagt serligt beslag á fólks skattaevnir. Satt er tað. Vit hava eisini áður havt frægari tíðir. Vit hovdu soleiðis eina nógd av peningi av hvalaveiðini, meðan vit nú ikki hava og ikki í fleiri ár hava havt eitt oyra. So sigir Effersøe, at hann kundi ynskja, at vit lótu okkara sorkesløsa politikk falla, tað vil siga, at vit ikki skuldu fáast við okkara forfatningsmessugu og nationalu støðu. Eg skal ídag ikki fara undir hetta. Men er tað sorkesløs politikk spurningurin um, hvussu man hagreiðir sítt land nationalt? Hetta má tykjast undarligt at hoyra. Nei, vit hava í hesum spurningi eina plikt til at forsvara hann fyri okkara fólki. Eg vildi ynkst, at vit vóru liðugir við hendan spurning, so at vit nú kundu loysa teir socialu spurningarnar. Um vit hovdu loyst teir nationalu spurningar, og tað hovdu vit, um ikki hrr. Effersøe hevði spent so troiskliga bein fyri teimum, so hovdu vit nógv betri kunnað loyst teir ekonomisku spurningar, harímillum vegsakina. Eg skal ikki koma meira inn á hetta.

O. Effersøe: Jeg vil heller ikke fordybe mig i dette Spørgsmaal. Hvad angaar mit Brug af Ordet ørkesløst, saa skal det ikke opfattes som Hr. Winther gør det, men jeg mente, at jeg fandt, at en Politik, som ikke paakræves af Forholdene, den er ørkesløs, og jeg mener, at denne Politik paakræves ikke af Forholdene.

J. Patursson: Effersøe segði, at hann hevði altíð haft tann størsta hug til at fremja vegsakina, tað haldi eg ikki. Alt tað Effersøe hevir arbeitt fyri at skaffa pening hertil á figgjarlógini, havi eg fimmið uppá. Og so vil eg spyrja: Er tað beint, at øll tann inntoku, ið verið hevir eyka-inntøka nidir krígnum er gingin frá fyri skatt? Tað hevir onga aðra staðni verið í verðini utan her, men alla staðni hava menn uetupp roynt at skatta hesar inntøkur so nógv sum møguligt fyri at fremja almenn arbeiði. Effersøe segði, at hann hevði altíð haft góðan hug fyri vegmálinum; eg skal loyva mær at lesa hvat hann segði herum í 1905 í sínum ummæli av verkfrøðing Horns vegplani: »Det synes, at Hr. Horn kun har haft Øje for Køreveje, men ikke for Veje for gaaende og ridende. . . .

En Hovedfejl er det, naar han mener, at Kørevejene vil blive Landkommunikationsvejene heroppe, det venter jeg ikke og haaber heller ikke, at de skal blive. Som Bindeled mellem Bygder eller som Tørvemarkveje vil Kørevejene ikke have synderlig Betydning. Nakað hann heilt vera neyðugt at gera vóru cykluvegir.

A. Samuelsen: Her er blivin stór diskussión burtur úr hesari sak og tað er heilt rímiligt, tí hetta hevir verið ein stór sak. Táið vit komu iun uppá at geva større tilskot til koyruvegir, so var tað tí vit meintu, at um Føroyingar skuldu klára seg í teim ringu tíðunum, ið kríggið førdi við sær, so mátti fólk have arbeiðislon til hvønn arbeiðistíma. Eg antaki, at J. H. Poulsen hevir rætt í tí, hann segði, at í fleiri plássum hevði lógin virkað gott, í øðrum ikki. Heldigvís hevir tað gingið betri uppi í Føroyum enn vit tráðu í 1917, tá hetta varð viðtikið. Vit viðtóku tá, at amtskommunan upptók eitt lán uppá 100,000 kr.; nú er spursmálið, um vit skuhi ganga víðari á tann veg, ella vit have pening nokk. Eg meini ikki, at vit skulu lána pening fyri at seta fleiri slík arbeiði í verk, vit vita, at tær 100,000 kr., ið vóru bevilgaðar, aldeilis ikki forsláa; tað varð upplýst í figgjarnevndini í morgun, at ialt 260,000 kr. eru bevilgaðar til vegir, tað er meira enn 100,000. Fleiri vegir koma at kosta meira enn yvirslagið ljóðar uppá, tað er meint, at sumir koma at kosta imtil 6 ferðir so nógv. Tey veganlegg, sum vit have begynt, mugu vit fortseta, forútsett, at kommununrnar vilja blíva við. Vit eiga at goyma spurningin til næsta ár, men heldur ikki longur. Útgiftirnar til vegir vilja óivað ikki falla so nógv; eg hopi, at arbeiðislonin ikki vil ganga ógvuliga nógv niður, og tað yrskja arbeiðismenn, har ið eg eri frá. Arbeiðislønirnar í Føroyum eru, táið alt kemur til alt ikki so ógvuliga høgar. Vit have ikki hrúk fyri hesum sum dýrtíðarforanstaltning, og hetta hevir heldur ikki virkað soleiðis. Vit have fingið tilsagn frá statskassanum um at fáa 50,000 kr. aftur, men og haldi, at vit eiga longu í ár at gera regeringina uppmerksama uppá, at yvirskríðilsini longu eru so stór, at tað vit have hildið kosta 200,000 kr., nú kemur at kosta mangar ferðir meira. Eg forstandi løgtingsbræðningin frá 1917 soleiðis, at her er talan um at geva 50 oyr pr. meter, tað forslær einki, sum tíðirnar eru nú. Men harav fylgir, at einki nýtt veganlegg kann begynnast fyrr enn ein nýggj viðtøka fyriliggur. Tað er nóg so ríniligt, at maa her komur inn uppá okkara finansiella stilling. Hetta hovdu vit greidliga frammi í 1906, og tá meinti tann helmingur av tinginum, ið tá var tann minni, men nú er tann storri, at vit til vegarbeiðir, skuldu hava eina árliga útreiðslu uppá 20,000 kr. Tað kann vera, at vit kunnu klára okkum við tí, men hesar pengar mugu vit kunna fáa utan nýggja skattalóg. Hr. Winther meinar, at hann hevir verið sparsommuligur. Eg meini, at táið eitt hugsar um, hvat fleirtalið hevir bevilgað pengar í hópátali til, so skuldi ein tráð, at løgtingið hevði eina orgryinnu av peningi. Og tað hava vit jú onganlunda. — Eg haldi, at teir menn eru ikki góðir við vegmálið og onnur mál, sum standa løgtinginum nær. Patursson helt, at tað var gott, um Effersøe hevði haft ta sonu góðheit fyri vegmálinum fyrr, sum nú. Eg veit ikki, hvat Effersøe segði i 1905, men í 1906 hevði Effersøe verið við til at gera nakað munagott fyri vegir (koyrivegir). Effersøe var ørðførari í tí útvalginum sum byrjaði arbeiðið fyri, at vit fingu vegir eftir ingeniør Horns plan. Effersøe virkaði í ríksdegnum fyri, at Sandingar fingu sín veg. Hann hevur ikki bara tosað um, hvussu góður hann er. Hann skaffaði Sandingum pongar, og tá teir soktu um meiri pongar, arbeiddi hann fyri tí. Tað er ikki bara spadserivegir og cykluvegir, men *koyruvegir*, Effersøe hevur virkað fyri. Tó kann oin koyruvegur jú eisini brúkast bæði til at cykla og spadsera á. Winther gremur seg um, at vit ikki have fingið eina aðra skattalóg. Eg havi ikki sæð, at Føringar have so nógvar pongar, tað er knípið hjá kommununum at fáa líknað nokk fyri at dekka útgiftirnar. Tað er tann samu skattaevna, vil nú beskatta, sum Winther vil hava beskattaða. Tað kann vera, at forretningsmenn í Føroyum hava nógvar pengar men teir vita ikki, hvat brúk teir fáa fyri tí, teir hava vunnið, tað kann koma vel við til at dekka seinni tá. Tað er væl ikki væntandi, at dýrtíðarforanstaltningarnir falla burtur, men gera teir tað, so er brúk fyri pengum. Nei, Winther skal ikki grøvja seg yvir, at pengarnir ikki blíva brúktir. Effersøe helt, at vit skulu halda okkum burtur frá orkisleysum betraktningum, tað haldi eg við. Okkara stoða er nú í góðum hondum, tað nýtist Winther ikki at frykta fyri. Tá J. Patursson sigur, at tann peningur, sum hevur verið brúktur til at byggja vegir fyri, hevur hann skaffað okkum, so er hartil at siga, at á sonu tíð

vóru Norðmennirnir so klókir at selja okkum so dýrt hvalakjøt, at teir skuldu fáu ráð til at betala tá stóru avgiftina. Vit hava sjálvi betalt gildið, og vit hava ikki nakað at takka hr. Patursson fyri.

J. H. Poulsen: Samuelsen sigur, at vit í 1906 høvdu ansligið 20,000 kr. til vegir og meinar, at vit ikki hava neyðugt at gera okkum so stór anstringilsir fyri at fáa 20,000 kr. Eg vil hartil siga, at tá vit í 1906 roknaðu við 20,000 kr., so mugu vit í 1919, nú alt er blivið so mangar ferðir dýrari, ikki hugsa, at vit fara ov høgt, tá vit rokna við 100,000, og eg meini ikki, at *tað* verður so nemt at fáa ráð til.

A. Samuelsen: Tá J. H. Poulsen sigur, at hann hevur roknað við einum stórum stigningi, má hann sum ein klókur maður vael ikki í síni tíð hava roknað við, at daglønirnar skuldu bliva við at vera 2 kr. Eg kundi tonkt mær, at teir, sum fáa tá stóru fortjenastuna við annað arbeiði, kundu brúkt nakað av teirri tíð til at arbeiða uppá veglygging.

J. H. Poulsen: Samuelsen sigur, at eg eri ein klókur maður, men eg eri ikki so klókur, at eg í 1906 dugdi at forútsíggja kríggið í 1914.

A. Samuelsen: Poulsen hevur ikki nóktað fyri, at har sum velstandurin er størri, kann krevjast, at tað verður útført størri arbeiði uppá vegir.

O. Effersøe: Samuelson har imødegaaet Hr. Patursson. Hr. Patursson har beskæftiget sig med min Stilling til Vejsagen, den vil kunne ses af det i 1905 optagne Referat, der er meget sammentrængt. Jeg udtalte der: »Jeg synes overordentlig godt om, at vi har faaet denne Undersøgelse af vore Vejforhold foretagen, og ligeledes om Ingenior Horns Betænkning i sin Helhed. Naar Hr. Patursson har beskæftiget sig med at læse, burde han have givet mine Udtalelser, som de var. Det viser sig, at jeg havde Forstaaelse af Kørevejenes store Betydning. Saa kommer der nogle kritiske Bemærkninger: »Imidlertid synes det, som om Hr. Horn *kun* har haft Øje for Køreveje og ikke for Veje til Gang og Ridning, men saadanne har ogsaa en Del Betydning«. Jeg ansaa saadanne Veje for et Fremtidsprojekt. »En Hovedfejl er det, naar han mener, at Kørevejene vil blive Kommunikationsvejene heroppe«. Jeg mener ikke, at Vejene nogensinde bliver Hovedkommunikationsmidlerne her oppe, det bliver derimod Havet. Naar jeg taler om, at Kørevejene ikke vil faa synderlig Betydning som Bindeled mellem Bygder eller som Torvemarksvejo, sigter det til, at efter den Plan, der forelaa, vilde Vejene ikke faa Betydning som Tørveveje eller Kommunikationsmidler mellem Bygder.

Hvad angaar Spørgsmaalet om, hvorvidt man mener, at Krigsfortjeneste er bleven beskattet, saa har man jo nu, som altid, beskattet efter Formue og Lejlighed. Indenfor Kommunerne skal man jo beskatte derefter, og den store Fortjeneste faar saa selvfølgelig den store Skat.

Der er intet til Hinder for, at vi med Amtsrepartitionsligningen beskatter Krigsfortjeneste. Med Hensyn til 1918 maa Flertallet have Ansvar for, hvis saadan Beskatning ikke har fundet Sted.

J. Patursson: Effersøe plagar at vera greiður; men nú hann skal forsvara seg, er hann tað ikki. Tað batar einki hjá honum at royna at koma burt frá tí at hansara stoðu nú er tvørtur ímóti hansara stoðu í 1902 og 1903 og 1904. Hann hevur tá lítið til yvirs fyri akvegnum. Hann helt fyri tá, at ingen Kommune skal blive paatvunget Havneanlæg og Vejanlæge. Hann helt, at slíkt var bara ein byrða fyri fólk. Hann var fyri dyrkingavegum, sum tingið hevur givið til. Men teir vegir sum binda bygdir saman, helt hann einki hava uppá seg. Hann nýtir ikki at smoast við at hann hevur broytt sína stoðu. Tað er einki skammiligt í tí.

O. Effersøe: Det trænger til at undersøges, om det er mig eller Patursson, der har forandret Stilling fra før.

J. Patursson: Vegspurningurin reistist í 1902. Effersøe hevur tá tað sama sýn á hesa sok sum avtoritetirnar, sum Buchwald hevði. Hann sigir tá: »Der kan aldrig være Tale om at anlægge Kørevej her paa Færøerne, fordi her er for stejlt.«

O. Effersøe: Nu kom Patursson ind paa noget nyt. Han mener, at jeg maatte have samme Stilling som Avtoriteterne den Gang, som Amtmand Buchwald. Jeg har nemlig paa et senere Tidspunkt haft betydelige Sammenstød med Buchwald.

J. Patursson: Tá eg nevndi Buchwald, so meinti eg harvið, at Effersøe hevði tað

sama kontórsýnið, sum ráddi hjá hesum manni, Effersøe helt ikki, at økvegir vildu hava nakran týdning.

O. Effersøe: Vejsagen var ingenlunde paa mit Kontor. Jeg vil advare imod, at man plukker noget ud af Tingreferatet i 1905.

J. Patursson: Í 1902 vóru her eingir vegnar, sum ikið varð við; kanske tó í Kirkjubø og hjá Júst á Húsum.

O. Effersøe: Jeg har maaske set Vogne her i Ryen, før Patursson var saa stor, at han begyndte at komme til Thorshavn.

J. Patursson: Jú, Müllar hevði vogn. Teir høvdu spent ein óvandan hest fyri hann, og hann legði undan við vognin og endin var, at alt datt oman úti við Jacobines Kilde. Síðani varð hildið uppat.

A. Samuelsen: Eg vil minna Patursson á, tá hann lesur um Effersøe eisini at lesa upp tað, hann svarar Effersøe aftur. Patursson kundi hava mótsagt Effersøe í 1905. Men hann tykist har at vera samsintur við hann. Og í 1906 virkar Effersøe fyri at fáa tilskot til vegir, meðan Patursson hevði roynt at fáa pening til havnir, vegir og telefon, men kom heim aftur úr Køpmannahavn við ongum. So tók Effersøe fatt og fekk tilskot til havnir, vegir og telefon. Tað skyldast ikki Effersøe, at vit ikki hava fingið havnir bygdar. Eg kann forstanda, at Effersøe í sínum tíð hevur sagt í sínum upprópi, at ein kommuna ikki skal átvingast vegir. Hvussu illa gongst tað til dømis ikki enn við at fáa vegin í lag millum Velbastað og Havn. Patursson sigir, at vognurin hjá Müllari einans varð brúktur einaferð. Hetta er væl kanske líka so sannferdugt sum hitt hann hevur sagt. Hann plagar at siga ynist her sum vísir seg at vera ósannheit, tá tað kemur til stykki. Tað er gott at siga móti deyðum manni, tí ein slíkur kann ikki svara aftur.

Nyholm Debess: Eg havi roynt at hurta eftir tí, her er sagt, og haldi, at tað hevur lítið við sakina at gera, serliga tað sum A. Samuelsen hevur flutt fram.

A. Samuelsen: Eg veit ikki, at tingmaðurin Debess er settur til censor her. Tað sum eg havi sagt, er í noya samband við tað, sum er sagt undan.

Nyholm Debess: Ikki júst tað; men eg finni hetta nógva úttanumvega tosið fyri at vera orkesleyst.

A. Samuelsen: Tað er orkesleyst av Debess at seta seg til censor yvir mær.

Nyholm Debess: Tað var og klárur yvir.

A. Samuelsen: So var tað orkesleyst at fara og hava at mær.

Umsóknir frá skiparafelagnum.

1. viðgerð.

Nyholm Debess: Her er framlagd sak frá Føroya skiparafelag, sum umhandlar tríggjar ymiskar spurningar. Sakin hevur fyrr verið á tingi. Felagið biður um, at so verður fyriskipað, at tað skulu vera bestemtir menn til at føra motorbátar. Sum nú er, er einki ásett um hetta; hvør maður kann fara umborð sum hann vil. Nú vil felagið, at tað skulu vera bestemtir menn, og skulu teir vera kunnugir við tær internationalu sjóreglurnar. Tað er ríminligt, at man vil hava eina góða skipan her, tí her er man við tá grein av okkara vinnulívi, sum mest lovur at týða. Henda grein av vinnulívinum er ein tann størsta og týdningarmiklasta, og við tað, at tað er so nógv til av hesum motorbátum, vil tað vera nakað vágið at lata allar hesar bátar fiska utan serligar forarar. Teir liggja ofta nógvir og tætt saman og ofta á sama plássum sum sluppurnar. Saman við hesum nevnist eisini tað brek, ið kann vera við teirra lanternuføring. Lógin verður ikki hildin og umframt meina teir, at lógin er óholdig, við tað at hon loyvir at brúka samansottar lanternur, og tær eru ikki væl nýtandi í motorbátum. Tað hevir ofta verið samanstoyt sum fylgja av mangelfullari lanternuføring, uttan skaða oftast, meðan tað er lent, at motorbátur er sokkin, tí forarin ikki kendi sjóreglurnar. Hesin spurningur var framuni á tingi í 1915; tá hevði frammanundan verið skrivað millum amtið og felagið, og tá svaraði amtmaðurin, at man eigur at bíða til hesi viðurskifti verða ordnað í Danmørk, men eingin okkara veit, nær tað verður ordnað harniðri, og felagið heldur tað vera óforsvarligt at bíða longur. Hetta var tann eina umsóknin frá felagnum. Tó skal eg, áðrenn eg fari víðari, vísa á,

at har kom eitt slags úrslit úr forhandlingunum í 1915, við tað at tað var ásett, at eitt eksemplar av sjóreglunum skuldi vera um borð í hvørjum motorbáti. Hetta kann tó ongan praktiskan týdning hava, tí um nú ein nýggjur førari kemur um borð í ein bát og hann fyrsta dagin kemur í onkran vanda, so er ov seint at fara at losa sær uppá sjóreglur. — Tað næsta teir biðja um í einum øðrum skrivilsi, er um at fáa ein rætt aftur, sum teir áður hava haft og sum ein nýggj sjóneringslóg hevir tikið frá teimum. Fyrr kundi ein fiskiskipari fiska aðra staðni enn undir Føroyum, Íslandi og Rockall; teir kundu fiska frá Íshavi til Íshavs; tað kann kanska vera, at hetta ikki var fult betryggjandi, men tað kann í hvussu er ikki pávísast óheldugar fylgir av hosum. Nú verður ikki altíð tann fiskarikdómur her í nánindu, sum her hevir verið tey seinastu árini, og teir biðja tí um eitt útvíðkaðan prøva í navigatión fyri fiskiskiparar, ið vilja kunna fara longri leið fyri at fiska. — Tað seinasta, teir biðja um, er, at okkara fiskarar mega verða javnsettir við danskar sjómenn. Sum lógin nú er, vera føroyskir fiskarar mettir javnt við danskar útróðrarmenn. Eg vil ganga við til, at ein danskur útróðrarmaður má metast javnt við ein føroyskan útróðrarmann, men hitt kann eg ikki halda, og felagið fastheldur tað, at føroyskir fiskarar í teirra fiskarí eru líka so væl kvalificeraðir sum sjómenn sum danskir sjómenn. Prógv eru framført herfyri, bæði við at føroyskir fiskiskiparar eru farnir sum stýrimenn við donskum skonnartum og nógvir alminniligir føroyskir fiskarar eru farnir sum matrósar við sonn skipum. Hetta er ikki eitt úrval av føroyskum skiparum og fiskarum, men hvør sum helst teirra hevir kunnað fingið dispensatión. Ein hvør, ið hugsar rætt, má viðganga, at føroyskir fiskimenn eru at meta javnt við danskar sjómenn. Eg vóni, at allir tingmenn eru samsintir í hesum, tí henda lóg er ein stór minkan fyri okkara fiskarar, at vit skjótast mega fáa hana broytta og fyri fiskararnar náttu hetta vera ein ringur biti at gloypa. Eg skal mæla til, at málið fer til eina 5-mannanevnd.

A. Samuelsen: Tað eru fleiri spursmál her og øll eru tey tinginum kunnug, og tey flestu hava verið her til umræðu fyrr. Tað fyrsta var um motorbátaførarar, tað hava vit haft fyrr her á tingi til umræðu og vit komu tá til eitt resultat; ordførarin meinar, at tað ikki hevir nógmikið at týða og felagið meinar tað sama; men um tað ongan týdning hevir, má tað liggja hjá fólkunum sjálvum; mær dámar ikki at skapa fleiri eksamiur enn neyðugt. Vit vilja láta motorbátaførararnar hava atgongd til at seta seg inn í sjóreglurnar, tað sum er nødvendigt. Annars haldi eg, at um tann framstilling, sum skuldi nýtast, ikki er nóg mikið lætt fatandi, so átti felagið — og vildi væl eisini — hjálpt til at gera tína meira lættfatandi. Eg trúgvi ikki, at tað er so galið við motorbátaførarunum sum ordførarin helt; tað hendir jú eisini, at tað gongur óhelduga til umborð í skipunum, og har er ikki bert ein skiparalærdur maður umborð, men oftast fleiri. Eg trúgvi, at okkara motorbátaførarar eru ógvuliga samvittigheitsfullir menn, og har, eg eri frá, hevir man altíð ein vissum mann til førara av bátinum. Umborð í skipunum hevir tað eisini verið soleiðis, at táið skiparin ikki hevir viljað farið út ein túr, hevir bestimaðurin kunnað fort skipið her undir Føroyum, sjálvt um hann ikki hevir verið skiparalærdur, og tað hevir altíð gingið væl. Eg haldi ikki, at vit skulu rubba bondini, men kunnu vit fáa nakað betri burtur úr, skal eg váða partafelagum mínum at arbeiða væl í nevndini. Tað eru nógvir motorbátar í Føroyum og hetta er ein viktugur spurningur. Við hensyn til hinar báðar spurningarnar skal eg ganga lættari yvir teir, tí teir hava verið her til umræðu seinni enn hesin fyrsti. Men eg má halda, at um man meintar, at henda lóg av 1915 ikki hevir verið góð fyri okkara fiskarar, so má skyldin fyri ein stóran part vera hjá tí løgtingsnevnd, ið hevir arbeitt herum við kontórchef Krogh. Tað hevði verið gott, um man hevði lagt meira vekt á hesar spurningar, tá man forhandlaði við kontórsjefin.

R. Rasmussen: Tað er ikki mín ætlan at fáa í lag ósemju á ting um hetta mál, eg haldi, at hartil er tað ov týdningarmikið og ov neyðturvuligt at fáa framt. Eg skal væl viðganga, at tað er mangt í hesum báðum broytingum av 1/4 1919 til sjóneringslógina og navigatiónseksamenslógina, sum er okkum til hata; men og nú grenja meg um, at tað er tikið solítið hensýn til, hvat menninir frá løgtinginum fordu fram í kommissiónini, sum í vetur var saman. — Ja, tað er so illa vorðið, at broytingin til sjóneringslógina uppá tvey punktir er í stríð við tað, sum samtykt var. Menn kunnu kanska trætast um, hvussu vesentlig hesi punktir eru — og meini, at tey eru nokk so týdningarmikil. Til dømis hevur

tað stóran týdning, at bestumennirnir hava fiskiskiparaprógv av I. klassa. Teir skulu jú vera førir fyri at navigera skipið úti í rúmum havi, um skiparanum berst frá; tað kunna skipurar av II. klassa ikki, og tann lokalkunnleiki, sum kontórchef Krogh helt fram sum havandi týdning við fiskifart fram um við fraktfart, hevur ikki stórt at týða, tá land er úr eygsjón og botnur ikki fæst, og tað er ofta tilfelli, tá føroysk fiskiskip driva av antin á bankanum ella á ferð millum Ísland og Føroyar í óveðri. Um hendar spurning, um bestimaður skuldi vera I. ella II. klassa maður, var fyritikin avstemning í kommissiónini, men bert millum løgtingslimirnar. Fyri I. klassa stemmaðu R. Niclasen, N. Debess og R. Rasmussen, fyri II. klassa stemmaðu Tórgarð og Mortensen, og tó er broytingin gjørd eftir, hvat nimnilutarin var fyri. Tað er skeivt. Amtmaðurin, fútin og kontórchefen stemmaðu ikki, so tað kann ikki vorað tikið hensýn til teirra meining.

Hitt punktið, hvar løgbroytingin er í stríð við tað sum løgtingsmennirnir í kommissiónini frá í vetur, hildu fram er viðvíkjandi tí umráði, hvar fiskiskiparar av II. klassa hava loyvi at fiska. Vit meintu, at tað mátti markast til undir Føroyum land í eygsjón, og at tað var okkum til ongu nyttu, at hettar umráði var víðkað suður eftir til Norðsjógvin og víðari, har hava vit einki at gera, og har er meiri vandi enn undir Føroyum fyri ovlíðið lordar menn, sum ikki hava tann neyðturvuliga lokalkunnleika.

Viðvíkjandi tí, sum til viðgerð var á løgtingi í 1917 um at vit skuldu fáa loyvi til her í Føroyum at taka eitt prógv, ið skuldi geva okkum rætt til eitt serligt bovís fyri Føroyar, hvarvið vit kundu fiska um allan sjógv og til eitt víst mark sigla í fraktfart, skal og loyva mær at siga frá, at tá vit bóru okkara krav fram um hetta, gav kontórchef Krogh tað boskað, at tílíkt vildi hann ikki innlata seg í forhandling um, tí ministeriið vildi ikki fremja nakað, sum vildi føra til eitt nýtt sjóneringsbevís fyri Føroyar. Her var so einki at gera hjá okkum uttan at bíða og reisa sakina aftur á tí stað, hvat vit hava rætt til at reisa og fasthalda krøv um *alt* sum viðvíkir Føroya vinnulívi, her á løgtinginum. — Vit framførdu so bert, at vit høvdu vón um, at ministeriið í tí, sum tað gjørdi viðvíkjandi okkara víðari gangandi fiskifarti og sjófarti vildi ganga út frá tí, sum løgtingið samtykti í 1917. Hetta tykist mær ikki at vera gjørt í so stórt mál sum vit kundu vænta, tí er tað rætt natúrligt, at skiparafelagið kemur inn á ting við hesum spurningum, sum tað er komið. Vit vita, at lógin av 1916 setur tað mark fyri at okkara fiskiskiparar fiska, aðrastaðnis enn við Føroya og Ísland, og at teir við síni sætteskiparaexamen ikki kunnu fáa sættoskiparabrævs vegna tess, at teirra sigling við fiskiskipum ikki verður roknað fyri sjófart, ella at teir kunnu koma inn á stýrimannsskúlan og taka stýrimannsprógv. Hetta var tað sum vit vildu bota við tí, sum løgtingið einmælt samtykti í 1917, men sum kontórchef Krogh segði ikki kundi verða fraut. Samuelsen meinar, at vit hava verið ov linir í kommissiónini, og meini vit hava tikið tað góða vit kundu fáa, meðan vit ikki hava givið eftir í ti vit ikki kundu fáa.

Eg skal ikki siga meira um hetta, men bert leggja til, at eg haldi, tað krav, skiparafelagið setur fram um motorbátaførarnar er fult út rættað, tí tað er munur á tí ansvari fyri mannalívi og virði, sum hvílir á føraranum á vágrunninum her á myrkari nátt millum trawlara og onnur fiskiskip og tað, sum hvílir á teimum, sum føra motorbátar innanfyri Skagen. Teir fyrrn hava ólíka stórri ansvar bæði vegna farvatnið og vegna tess at fiskiskapurin verður drivin harðligari og skilaloysari, sum vera man tá ymiskar nationir koma saman, uttan fyri sjómarkið. Eg haldi, at vit hava náað vissar fordeilar við hesi lógbroyting; men teir hava ikki avhjálpt tilstrokkiligt teir vansar sum koma fyri hjá føroyskum sjómonnum við lógini av 1916. Vit skulu tí semjast um at fáa tað best moguliga úr hesum uppskoti frá skiparafelaginum, sum fram er lagt.

A. Samuelsen: Eg havi ikki inntrykk av, at tað her drejar seg um livspurningar. Men um vit kunnu avbota nakað av tí sum varð gjørt í 1916, so mugu vit gera tað. Av lógini í 1919 havi eg tað inntrykk, at man kann uppnáa nakað. Kunnu vit fáa broytt lógina, so er tað rimiligt, at vit gera tað, men tá kunnu vit ikki leta hensýn til kommissiónina spæla so nógva rollu. Meina vit at tað er neyðugt, so mugu vit fara aftur til regeringina. Og eg haldi ikki, at man skal smáast at benytta sær av dispensatión, sum ministarin kann geva. Rasmussen og eg eru samsintir um sjálvan høvuðsspurningin og eg vænti vit vera samsintir framdeilis.

Nyholm Debess: Eg var eisini limur av kommissiónini og eg vil altíð viðganga, at

eitt starv, sum eg havi verið við til ikki er so gott sum tað átti at vera, og hettar er heldur ikki vorðið so gott, sum eg yntsti tað at verða. Ég havi tann uppfatan, at annaðhvørt er at royna alla ikki. Og tá man slær av øðrumunni, so eigir man eisini at sláa eitt sindur av hinu minni. Tað er sligið nógv av okkara minni og lítið av hinu minni. Tað kann einki vera í vegin fyri, at ein viðtøka kann koma framm frá tinginum; tað kann so ikki sigast, at tað standur heilt í botni. Ég kann væl skilja, at skiparafelagið kemur framm aftur í ár við hesum spurningi.

A. Samuelsen: Mær dámar ikki at tingmenn bæði her og utanfyri tingið skulu kæra seg um at teir sláa ov nógv av fyri tað at ein kontórsjefur, sum hevur verið her uppi, sigir eitt annað. Tað er ikki beint, um tað drejer seg um týdningar mikil punktir. Ein kontorsjef er ikki síðsti innstansur, tá tað ræður um lógmál. Hann visti hvat ministarin meinti, sigst tað. Men tað kundi tó vera, at mann fekk hetta igjognum, tá mann framsetur grund fyri hvussu týdningarmikil sakin er fyri okkara fiskarar. Um tað skal vera knýtt og bundið fyri Føroyingar at fara á fiskiveiðu norðanstaðnis enn til Íslands og at fara á navigatiónsskúla, so er tað reint illa.

R. Rasmussen: Tað er ikki reiðiligu rætt sum A. Samuelsen vil siga, at vit í nevndini hava sligið av fyri tað at ein kontórsjefur hevur øðra hugsan. Men vit fola, at tað batar lítið at gera krav. Ég haldi, at orðini hjá kontórsjefinum eru tey avgerandi yvirfyri ministaran; hann er bæði herdur og eygu hjá ministaranum. Men tað er grund til at fremja eitt gamalt krav um siglingsrætt fyri Føroyar her á tingi. Tí tingið hevur rætt og myndigheit til at upptaka eitt hvørt mál av økonomiskum týdningi fyri landið. Her í hesi frágreiðing standur: »Rasmussen og Debess vilde kunne gaa med hertil, idet man dog forudsatte, at Ministeriets Undersøgelse af Spørgsmaalet vilde tage Udgangspunkt i de Forarbejder, Lagtingets Udkast indeholdt derom«. Tað helt kantórsjefurin vera sjálvfylgjuligt. Og aftan á er framnhevað: »Der var herefter Enighed om, at for det Fiskeri, der foregik udover den nævnte Fart eller med Skib af over 250 tons bør gælde de sædvanlige Regler i Sønæringslovens § 2 og 3, *dog saaledes, at Lempelser kan fastsættes ved kgl. Anordning*. Lagtingsudvalget henstiller dog samtidig, at Ministeriet vil optage Spørgsmaalet om saadanne Lempelser til Undersøgelse ud fra det Forarbejde, der allerede er foretaget af Lagtinget«. Vit hava ikki fingið ígjøgnum tað sum man kundi hava vón um at fáa ígjognum.

A. Samuelsen: Hendan sakin er ein deil vanskiligari nú enn hon hevur verið fyrr í tinginum. Og vanskiligari verður hon um R. Rasmussen hevur rætt í at kantórsjefurin kemur at hava tað síðsta orðið í framtíðini. Um tað er, so mugu vit hava kantórsjefin burt. Um ministarin í síni administratión vil arbeiða sum hansara kantórsjefur, so má eisini ministarin burt. Eg skal halda fast við, at um Rasmussen og Debess høvdu hildið fast á tað, at hesi 2 punktir eru so týdningarmikil, at tað drejar seg um eitt lívsspursmál, so hevði tað gingið av sær sjálvum. Tað trúgvi eg. Ég havi tað alkeilis bestemta uppfatilsi, at bæði handilsministarin og kantórchefurin ikki vilja forða okkum í at útvikla okkara vinnuvegir fríst; nei, Rasmus Rasmussen hevir gingið ov vítt fyri at forsvara seg sjálvan. Tað kann einki nytta at senda sakina niður aftur nú, tí kantórchefurin sigur sjálvandi tað sama nú sum í vetur, og ministarin má já boyggja seg fyri honum, eftir hvat R. Rasmussen sigir. Men eg haldi ikki, at sakin er so hopleys, sum Rasmussen heldur. Ég havi ikki verið í kommissiónini, men hevði eg verið har, hevði eg væl sett meiri merg í hana.

R. Rasmussen: Samuelsen hevir altíð verið í tí mest radikala parti her á tingi, tað vita vit. Men fyri at tosa um sakini, haldi eg, at tey úttalilsir ið eru bókford í protokolini góvu okkum *rætt* til at venta meira burtur úr hesum enn vit fingu. Ég dugi ikki at skilja, hví A. Samuelsen ikki hevir rætt um hetta á ríkisdegnum, tí her standur í protokolini: »at Ministeriet vil optage Spørgsmaalet om saadanne Lempelser til Undersøgelse ud fra det Forarbejde, der allerede er foretaget af Lagtinget«. Ég havi ikki stórar vónir um, at vit fáa nakað stórvegis ígjøgnum við tí skili, ið nú er. So leingi, vit hava hesar menn, hvat antin teir eita ministarar ella kantórchefar, ið eru heilt óheftir av hvat løgtingið meinar, koma vit onga leið. Ég havi tráð tað oina ferð, men nú gongur mín meining meira og meira tann veg, at teir ið administrera Føroya sakir, skulu standa løgtinginum til svars. Okkara administratión má til ein vissan part rætta seg eftir fleirtalinum á løgtingi. Eftirsum

A. Samuelsen sær, at her er nakað ið ikki er heilt vónleyst, kundi man kanska vænta, at hann, um hann verður í ríkisdegnum tá, vil fremja tað, ið er eitt krav frá øllum Føroya fólki.

Nyholm Debess: Eg fekk tað inntrykk av kommissiónsarboiðinum, at tað var ikki altíð einigheit í nevndini, tað gekk so vítt, at einstakir limir tóku serstøðu, so tað hevir man ikki lov at siga, at einigheit var í tí vesentliga, og at tað bert vóru smáting ið skildu sundur.

A. Samuelsen: Nú sigir R. Rasmussen, at nú skulu vit fáa alt í eitt annað skil, so eisini kantórchefar kunnu vera undirgivnir politiskum viðurskiftum, og vænti nú ikki at uppliva tað. Tað havi eg nú heldur onga staðni hoyrt um, í hvussu er ikki her í norðurlondum, vit mugu fara longur burtur enn sum so, til Amerika kanska. R. Rasmussen spyr, hví A. Samuelsen ikki hevir tosað um hetta niðri í ríkisdegnum. Fyrst vil R. Rasmussen síggja av referatinum, at A. Samuelsen hevir sagt, at hann hevði fleiri ynskir herum, men tá hann ikki gekk longur, so var tað tí hann hevði tosað við Rasmus Rasmussen, og hann hevði sagt, at vit neyddust at taka tað vit kundu fáa og lata hitt bíða til vit einaferð kundu fáa tað. Tá upptrakkaði R. Rasmussen sum ein praktiskur politikari. Eg skal takka R. Rasmussen fyri, at hann setti meg inn í sakina, men av protokolini fær man ikki tað inntrykk, at henda sak hevir verið so viktug at fáa ígjøgnum í sínari heild, men man fær tað inntrykk, at nevndarmennirnir hava givið ov nógv eftir fyri einum kantórchefi.

R. Rasmussen: Tað var nettupp framlildið á tingi, at henda sak var ein lívssak fyri fólki í Føroynum. Tað er til deils rætt sum A. Samuelsen sigir, at og í vetur ráddi honum til at taka ta støðu, hann tók, men og peikaði honum tó á hatta punktið við fiskiskiparum av fyrsta og øðrum klassa (hóast vit ongar fiskiskiparar hava av øðrum klassa í Føroyum), og tað er keðiligt, at tað er gingið ímóti tí, sum avrátt var, tað vísir, at tað er eitt tendensur í ministeriinum til at ganga ímóti tí, sum løgtingið vil. Og A. Samuelsen letur tað sleppa gjøgnum fólkatingið. Eg mælti til at taka alt tað vit kundu fáa og taka hitt táið vit komu aftur til sakina, og nú eru vit komnir aftur til hennara, og eg vænti, at A. Samuelsen vil arbeiða so væl fyri hesum, sum hann sigir seg unna hesum væl.

A. Samuelsen: Eg havi tað inntrykk av hesum umsóknum, at tær eru ein kritikkur av løgtinginum, og tað er ein berættigaður kritikkur, og eg ætti kritikkin, har hann eigur at vera. Tá R. Rasmussen sigir, at her er ein tendensur til ikki at gera, hvat tingið vil, so vil eg biðja tingið hugsa, um ikki hetta ministerium, ið og annars ikki hava orð fyri at rósa ov nógv, hevir gjørt nógv meira enn nakað annað fyri hesari sak, við tað at teir hava sent ein mann herupp at forhandla við okkum og spara okkum fyri tíðspell við at senda brov aftur og fram, og teir hava rættað seg eftir okkum í tí vesentliga.

R. Rasmussen: Noktar A. Samuelsen, at lógin er í mótstríð við, hvat her er samtykt í nevndini, tá her eru fleiri punktir, sum slætt ikki stemma yvireins?

A. Samuelsen: Hatta hjálpir ikki Rasmus Rasmussen, tí punktini eru so óvesentlig, at skiparafelagið hevir ikki drigið tey fram, so eg haldi ikki, at hann skal brúka hasi bæði punktini til at bevísa, at ministeriið ikki hevir fylgt løgtinginum.

Samtykt varð at beina málini í 5-mannanevnd.

Fundur tísdag 12. august.

Studningur til arbeiðisleysar fiskimenn.

1. viðgerð.

Formaðurin: Sagen var til Behandling i Tinget ifjor. Det viste sig, at Udbyttet af Baadfiskeriet var ½ Mill. Kr. Ministeriet har derfor ønsket, at Tinget kunde faa Lejlighed til at forhandle paany om Sagen. Andragenderne vil blive sendt til Landbrugsministeriet.

J. H. Poulsen: Her fyriliggur skrivilsi frá amtmanninum um ta seinnu lógina, av 1918. Tingið hevur undir yvirvejilsi at fyrisláa at útvíða hana til Føroyar. Nú liggur skrivilsi fra ministeriinum um nýtt yvirvejilsi. Tað kann vera, at vit ikki leggja í at fáa hesa lógina til at gelda,

men at vit hava meiri interessu fyri lógini av 1917. Vit kjósaðu eina milluntinganevnd sum skuldi royna at fáa upplýsingar um, hvussu lógin fordist út í lívið í Danmark. Eg vísti á ífjor av eini statistikk, sum og ikki nú havi við houdina at inntøkan var nógv størri hjá teimum donsku fiskarnum enn hjá okkara, tó at tað kundi vera bíligari at liva í Foroyum. Í milluntinganevndini vóru A. Samuelsen, R. Rasmussen og eg. Vit vóru so allir í Danmark og royndu tá at fáa gongd á sakina. Eg vendi mær so til departementssjefin. Hann sogði, at lógin varð soleiðis fordi út í lívið í Danmark, at næstan allir fiskarnir fingu studning. Men í Danmark hovdu teir eisini organ, sum var millumlið millum fiskarnar og regeringina. Tað er fiskarafeleingarnar og fiskiskapsdirektorurin. Tað mangla vit her. Fiskimannafelagið í Foroyum er jú ikki reiðiliga tað sama sum hesar organisatiónirnar. Vit tonktu okkum so til at hendan milluntinganevndin kundi vera sum eitt slíkt millumlið. Nú sigir amtmaðurin, at tey andragandir, sum fyriliggja, verða send niður til landbúnaðarministoriið. Kundi tað ikki vera gjørligt, at vit fingu at vita, hvat amtmaðurin hevur ráðað ministeriinum til, at vit fingu at síggja tað, áðrenn tað fór niður. Tað er soleiðis, at fólk hevur gjort reikning uppá at fáa eitt tilskot. Hendan sok torvar at avgerast skjótt, so at tað verður friðar um hesa lógina. Eg vil ikki fyrisláa nakra navnd, men eg vil tó mæla til, at sakin kemur í nevnd.

A. Samuelsen: Eg haldi eisini, at hendan sakin má tara í nevnd. Vit skulu yvirveja, um at fáa lógina av 1. april í ár galdandi. Hina lógina skulu vit kanske ikki brýggja okkum um nú. Vit vistu, at tað var vanskiligt hjá okkum at fara ílag við hesa lóg. Vit meintu, at teir føroysku fiskarnir høvdu fortjent ójavnt. Men nógvir trongdu til studning. Tó er lógin so skipað, at teir neppa kundu fáa studning, tí tað er áskelt har, at arbeiðsloysi skal skyldast kríggínum; annars kunnu teir einki fáa. Motorbátarnir sinkaðust her vegna petroleumstrot, men róðrabátarnir kundu halda framm við at fiska. Og her fiskast enn mest við róðrabátum, sum tó kundu trongja til at fáa studning. Men prinsippið í lógini kundi ikki yvirforast á okkara útróðrarmenn. Og vit kundu ikki forandra hetta princípp, sum galdar tað sama fyri lógina í ár sum ífjor. Tó haldi eg at vit skuldu biðja um at fáa hesa lóg galdandi fyri Foroyar soleiðis, at føroyskir fiskarar kunna fáa studning. Vit mega gera hetta, antin sum eitt lógforslag, ella royna at fáa hetta sum eina hovilling við síðuna av. Eg vil biðja úttvalgið skaffa so nógvar upplýsingar sum muguligt, um hvat fólk tjenar her í Foroyum. Her er ganska vist nógv fólk, ið nú tjenar so nógva ferðir meira enn áðrenn kríggið, uttan eisini onnur, ið langt frá hava tjent tað minimum, sum her er nevnt. Eg uri forharmaður yvir, at sakin ikki er avgjord enn, so teir ið hava sokt og eiga at fáa ja, kundu fingið tað, og teir, ið eiga at fáa nei, kundu fingið teirra nei. Tann tíðin ið nú er, og tann næmasta tíð her fyri hevir verið hildin fyri rættuliga góð fyri okkara fiskarar, men so var tað tann tíðin ið gekk frammanundan og sum tann fyrsta lógin varð gjord fyri, tá var her so lítil fortjenasta. Av manga staðni var tann størsta neyð, og menn kom í skuld. Lógin var administrera niðri í Danmark, og fiskararnir har fingu ansalig undirstottilsir, har gekk man kortini ikki fram eftir lógar bókstavi, men leitaði hann nakað; eg fekk tað inntrykk av ministaranum og monnunum í administratiónini, at man átti at vera líka so elskverdigur móti Forovingum sum móti fiskarum í kongaríkinum. Vit kunnu ikki vænta, at løgtingið kann vera við til administratiónina av hesari lóg, tí hetta er av regeringini yvirgivið til amtmannin, men eg haldi, tað kundi verið praktiskt, um løgtingið fekk eitt sindur av innflydilsi uppá administratiónini av henni. Eg venti ikki, at resultatið verður gott, um man behandlar fiskararnar eftir bókstavunum í lógini, tí tá vil tað vera ein kelda til ótilfredsheit. Eg hava á fólkafundum hoyrt nógv av tósi herum, ið eg havi verið ógviliga keddur av; eisini hava aðrastaðni nógv fólk tosað við meg herum, og tey hava sagt mær, at tey hava so fult og fast stólað uppá hesa lóg, at fáa hjálp av henni, ja tað eru tey, ið hava tikið uppá kredit uppá teir pengar, tey vantaðu sær at fáa. Seinast frammanundan valgunum var nógv snakkað herum, men eg havi tó ikki sagt eitt einasta orð herum annað enn tað eg trúði, og eg ferðaðist saman við einum manni, ið eisini er tingmaður her, og sum var mín mótkandidatur, hann bríði tað sama sum eg; vit bóru bert boð um tað sum var okkum sagt í ministeriinum. Eg vil altíð vera forharmaður um at hava borið rong boð, men eg haldi ikki, at tingmaðurin Edw. Mortensen ella eg bóru onnur boð enn tey, vit vóru borettigaðir eftir forholdunum í ríkisdegnum. Eftir-

sum antmaðurin er biðin um at administrera hesa lóg, kundu vit kanska fingið nakað gott burtur úr einari konferencu við hann, og eg vænti, at hann ikki vil mótseta seg hetta.

S. P. úr Konoy: Eg vil bert ásanna tey orð, hr. A. Samuelsen segði, at henda lóg hevir verið til skaða fyri fiskaramar, tí teir hava tráð uppá at fáa hjálp av henni, og teir hava ongan pening fingið, men verri enn hetta er, at hon hevir sýnt teimum, at teimum verður gjordur órættur, og at tað verða teir, ið koma at sita við sviðið soð. Hetta hevir skapað óró millum fiskarannn, og tað er ikki at undrast á. A. Samuelsen talaði um »Lovens Bogstave, at tað vildi vera til skaða fyri okkara fiskinemm um hann var fylgdur; ja, tað er jú einki gott úrslit; men eg vil ráða sterkliga ímóti, at vit senda sovorðnar menn niður til Danmarkar, ið eru so sterkir í trúnni, at teir líta soleiðis á eina lóg sum hesa.

J. H. Poulsen: Eg skal loyva mær at bera upp á mál, at sakin fer til eina 5-mannanevnd.

A. Samuelsen: Tingmaðurin úr Oddu citeraði meg á donskum, tó at eg tosaði føroyskt, tað man vera tí honum dámar so væl at úttrykkja seg á donskum. Eg meinti ta lóg, ið nú er ætlað at útvíðkast fyri Føroyar. Fyrst tosaði eg um hana, síðani um hana ið longst er liðin og ongantíð var administrera heruppi. »Lovens Bogstave er nakað farligt nakað, ja, tað veit hr. Konoy sjálvur, tað slør fhel, hann er jú sjálvur ein hálvtgeistligur maður. Bæði Edw. Mortensen og eg hava ikki borið onnur boð enn tey vit kundu hava rætt til at bera, eftir teim úttalilsum, ið vórn framsett fyri okkum niðri í ministorinum og ríkisdegnum.

Edw. Mortensen: Eg ætli ikki at stilla meg til fyrsta fólkatingsval, so hr. Konoy kann spara sær sína frykt fyri at fáa meg avstað aftur hesi ferð. Annars havi eg ikki sagt annað um hesa lóg, enn hvat eg hevði rætt til.

S. P. úr Konoy: Eg havi ikki talað um kandidatur, men eg vænti, at bæði A. Samuelsen og Edw. Mortensen vilja viðganga, at teir hava verið væl so fastir í trúnni.

A. Samuelsen: Eg segði, at tann trúgvin var væl bogrundað, og tað var hon. Tað er jú heldur ikki sikkurt, at einki kemur burtur úr hesari lóg, fyri tað um tað ikki er komið enn.

S. P. úr Konoy: Eg segði, at einki *er* komið burtur úr, tað er nakað heil annað. Danskir fiskimenn hava fyri langtsíðani fingið teirra studning.

A Samuelsen: Danskir fiskarar hevdu imgivið teirra ansokningar langt áðrenn føroyskir.

Poul Nielsen: Tað var av Føroya fólki stillað sterkar vónir til hesa lóg; eg siggi tí, lat okkum fáa sakina gotil eftirkannaða, so vit kunnu fáa upplýst, hvor ið hevir skuldina fyri, at einki er komið burtur úr.

Edw. Mortensen: Eg vil fráleggja mær alla skuld eins og sýslumanni Samuelsen, tí vit hava ikki sagt orðvísi frá, enn tað var sagt fyri okkum.

Formaðurin: Med Hensyn til Skylden for, at Loven ikke har virket paa Færoerne, forekommer det mig, at Skylden ligger i, at Tiderne er blevne bedre end man havde forudset, da Loven blev gennemført. Det er jo saaledes, at Fiskerne heroppe har tjent mange Gange mere, end nogensinde før, saa der aldrig har været saa mange Penge mellem Folk, som netop de sidste Aar. Dette synes jeg, burde man gøre de Fiskere klart, der er utilfredse og mener sig forurettede. Set paa Baggrund af den forholdsvis gode Indtægt, Fiskerne nu har, tror jeg ikke, der bliver Anvendelse for Loven. Man læser jo om det i alle Blade, hvor usædvanlig gunstige Tiderne er for alle fiskeriinteresserede for Øjeblikket. Der er her ikke Tale om Forventninger, der er blevne skuffede, men om Frygt for daarlige Tider, der har vist sig ugrundet.

Th. M. Strøm: Eg eri ikki av tí meining, at tíðirnar hava verið so glimrandi fyri føroyskar fiskimenn, sum formaðurin sýnist at halda. Tær fortjenastur, fiskarnir hava haft, eru lítlar í forhold til aðrar, ið tjentar eru undir krígnum, og eru lítlar í forhold til vøruprísarnar. Tað framgongur av statistikkinum, at danskir fiskarar hava tjent so nógv meir, og tó hava teir fingið sítt tilskot, meðan Føroyingar einki kundu fáa. Til Andrass Samuelsen vil eg siga, at

og haldi ikki vit eiga at biðja um nakað, tá vit ikki eiga rætt til tað.

Poul Nielsen: Til tað ið formaðurin segði um tær glimrandi tíðirnar, føroyskir fiskarar skulu hava haft, vil eg minna um at hesar sonn tíðir júst hava verið exceptionelt góðar fyri Danmark og danskar fiskarar. Og tó hava teir fingið studning, meðan okkara fiskarar einki fingu.

A. Samuelsen: Teir seinastu talararnir hava fyri ein deil tikið mær orðið útav munninum. Eg kann ikki vera einigur við formannininum í at tann unstendigheit, at okkara fiskarar hava tjent pengar í seinra partinum av 1918 og fyrrapartinum av 1919 skal vera bestonmandi fyri vetramánaðirnar 1917—18. Hevði lógin verið sett íverk sum hon var niðri í Danmark, so høvdu okkara fiskarar longu ífjør haft fingið sínar pengar. Teir donsku fingu teirra tilskot útbotald longu í juni. Tað at tíðirnar vóru betri seinri átti tó ikki at ført við sær, at fiskararnir mistu teirra undirstøttilsi fyri hesar fýra vetramánaðirnar, tí pengarnir ikki vóru útbetaltir áðrenn. Allir eru tó einigir um at erkenna tað, at hesir mánaðirnir vóru ringir, at fortjenastan hjá teim flestu var ónatúrliga lítil. Væl vistu vit frammanundan, at lógin ikki egnaði seg so væl fyri føroysk fiskaraforhold sum donsk, men vit eiga at fáa uppfylt tey lyftir, sum ministarin gav okkum undir behandlingini av lógini, at hon skuldi verða anvend so elskverdiga sum møguligt sjálvtum bokstavirnir ikki passaðu so væl. At Føroyingar skulu missa tað, teimum av rottum tilkemur, fyri tað at teir ikki fingu tað í góðari tíð og síðani hava haft betri fortjenastu, kann ikki vera beint; danskir fiskarar refundera jú ikki nakað av tí, teir hava fingið. Tað er heldur ikki beint at dividera tey tølini okkara samlaða bátafiskarí vísir og harav draga slutningar fyri hvønn einkultas trongd; her má takast hensýn til hvønn íser; tað eru tær smáu portiónirnar, sum studningurin tilkemur. Eg vnski at siga tað, at hava danskir fiskarar fingið so og so nógv eftir hesi lóg, so eiga Føroyingar at fáa forholdsvís líkanógv.

R. Rasmussen: Eg var ikki heilt klárur yvir, hvat formaðurin siktaði til í sínai næstseinastu talu, men nú hoyri eg hann meinar við tær lógir, ið fyriliggja nú. Tað er jú eitt annar sok, men kortini kann eg ikki lata vera við at koma inn uppá tað, sum hevur verið, tí heila henda sak er so skeivt fyri komin sum noknr kann vera. Tá vit í vetur, Jóhan Hendr. Poulsen, Andrass Sámalssom og eg hovdu fingið í uppdrátt frá tinginum at fara niður til Kaypmannahavnar og tala við ministaran og fiskarídirektørin nm hetta mál, fekk eg tað inntrykk, at grundin til at einki var gjort harmiðri fyri at fremja tað, eina mest var tann, at teir hovdu hildið fiskaríið í Føroynm hava givið so avbern nógv av sær, at tað ikki var neydugt. Hesa hugsan helt eg teir hava fingið úr pressuni og tí, sum har hevði verið skrivað um føroyskan fiskiskap. Sjálvsagt hovdu teir einki at gera við at taka hensýn til slikt; vildu teir haft upplýsingar, kundu teir væl fingið teir um teir vendu sær til amtmannin. Eg veit ikki, um teir hava gjort tað, men so mikið er víst, at atvoldin til, at nú nakað er gjort heruppi við at undirsøkja undragandini, kanna eftir hvør ið berafftigaður er til studning fyri vetramánaðirnar decbr. 1917 -april 1918, hon er at søkja í tí, *vit* hava framborið fyri ministerinum. Formaðurin sigur nú, at hetta er sant....

Formaðurin: Vil blive sendt!

R. Rasmussen: ...vil blive sent til landbrúksministeriið. Tað tap, útiróðramenninir hava haft vegna óvedur, kann kannska ikki beinleiðis koma innundir fylgir av krígnum og tó má tað fyri ein part roknast til tær, tí fiskararnir vóru tá neyddir at brúka róðrabátar vegna oljutrotið. Eftir hesi nýggju lógini fellur kannska ikki stórt til Føroyingar, men mær tykir tað undarligt, at ministarin spyr uppaftur, tá vit hava tikið greidligan stilling, sum jú er honum kunnugur. Vit kunnu ikki fara at grunda okkara stoðu á ta fortjenasta, sum komin er aftaná, so avbera stór er hon tó ikki.

Formaðurin: Jeg maa overfor det ærede Medlems sidste Bemærkning tage Ministeren i Forsvar. Der er ikke noget mærkeligt i, at der fremskaffes ny Oplysninger om, hvilket Udbytte Fiskeriet har givet i 1918, og det er gansk rimeligt, at Ministeren nu ønsker Lagtingets Udtalelser om, i hvilket Omfang dette kan virke ændrende paa de tidligere Forhold.

A. Samuelsen: Eg vil ikki siga ministarenum ilt fyri at hann hevur sent okkum hesa nýggju lógina; tvørtímóti eri og

gladur, hvorja ferð løgtingið verður spurt um vit vilja hava eina nýggja lóg galdandi fyri Føroyar

S. P. úr Konoy: Eg eri ikki sinnaður til, at vit skulu blíva við at bíða, eg haldi her nærmast sum Strøm. Og eg ivist ikki í tí at lótu vit nú spyrja í teim ymisku fiskimannafelagunum um teir vóru til sinnis at biðja meir, so hevdu vit yvirhovur fingið til svar: Nei, latið nú verða at biðja meir — vit hava tó ærn í lívinum! Teir fingu skorna at útfylla, har teir skuldu greiða frá bæði líthun og skórnum sær sjálvum viðvíkjandi, tey vóru so send til forstøðarskapin at granska, ár leið undan ári, meðan teir bíðaðu og so tá til endan kemur fáa teir eingi. Alt hetta tykist mær bert eitt nýtt og talandi dømi um, hvat vit eru í Danmark; tað smíðar lógir fyri okkum, onkur veitrar við flaggimum o. s. fr. — og harúti er tað komið.

J. J. Weihe: Tíðirnar hava ikki verið so góðar fyri allar føroyskar fiskarar, sum formaðurin sigur frá; í hvussu er ikki fyri teir sum rógva út uppi í Íslandi. Ífjør komu teir aftur summir við geld og tár. nú teir kundu hatt vónir um at fjent tað innaftur, noyddust teir at verða sitandi heima, tí teir fingu ongan fart. Eg vildi gjarna ynskt at fingið at vita, hví eingin fartur kundi fáast tár og hvør ið hevur skyldina fyri tí.

A. Samuelsen: Eg haldi ikki, at tingið eigir at fylgja Konoy og einki gera í hesi sok. Nú er ein hópur av fiskarum ikki í fiskimannafelagimum, so at hann kann ikki tala á teirra vegna, og heldur ikki fyri alt fiskimannafelagið. Tá Konoy vil vísa, at hendan lógin nærmast hevur virkað sum ein mishandling av Føroyingum, tá er hetta eitt nakað illsint anvendilsi av henni. Sakin er ikki avgjørd enn. Eg setti fram eitt uppskot í nevndini, sum skuldi stilla Føroyingar gunstigari enn eftir tí lóg, sum er givin. Men tað vildi nevndin ikki hava at gera við. Tað uppskotið verður lagt framm aftur í ár.

S. P. úr Konoy: Tað stendur A. Samuelsen frítt fyri at leggja tað fram aftur.

A. Samuelsen: Eg skuldi kanske ikki hava verið skroypiligur og givið eftir fyri fiskimannafelags-representantinum. Men nú kanske at hann vil hava meiri interessu av minum uppskoti, tá tað aftur kemur framm.

Samtykt varð at beina sakina í 5-mannanevnd.

Motorbátahavn í Hovi.

1. viðgerð.

D. J. Thomsen: Tað er komið bønarbræv frá Porkeris søkmar kommunu til at biðja tingið virka fyri at hevða kommunna kann fáa motorbátahavn í Hovi við statsstuðningi. Sakin var á tingi í 1913. Tingið var samsinnað um at tað vildi ikki gagna at søkja um statsstuðning, tí sakin var komin ov seint. Lógin av 29. apríl 1913 hevði neyðuliga tikið avgerð um hvørjar havnir sum skuldu hevilgast til. Tingið ráddi tí til at koma aftur við sakini tá tey 5 ár vóru gingin, sum lógin fyrisetti. Tað hevði borið til at koma aftur við sakini í 1918, men eftir sum kríggið helt við hildu Hovbingar at tað ikki vóru so góð líkindi. Sakin kemur tí framm nú. Teir ynskja hesa havn bygda eftir tí sama projekti, sum var gjort av Palle Bruun. Og teir meina at teir hava góðan rætt til at biðja um statsstuðning til at fremja verkið. Tí tað er longu væl fyrireika av natúrinnar hond, kann ein siga. Hovbingar meina, at hettar verk vil fremja bygdina ómetaliga nógv. Tað at teir ikki hava motorbátahavn í Hovi nú teir hava tílíkar bátar bæði í Vúgi og Trongisvági, vil gera, at Hovbingar koma at standa so nógv aftanfyri hesar menn í luntokuni, tí at teir ikki kunnu sokja teir fiskigrunnar, sum hinir menninir kunnu. Hov liggur mitt á eystursíðuni á Sudroynni og besta fiskiloið er norðanfyri, summanfyri og vestanfyri oynna. Tað er ónogiligt hjá Hovbingum at koma forbi oyar-ondarnar við opnum báti til teir bestu fiskigrunnarnar og koma teir á fiskigrunnarnar eystan fyri, so liggja teir mitt í motorbátaflokkinum. Teir fáa so at siga einans leiligheit til at fiska við landið, meðan hinir sleppa longri til sjós, og á tann hátt vera teir altið í afturhond. Eg vóni, at tingið vil taka væl við hesi sak og stýðja hana. Og eg mæli til at hon fer í 5-mannanevnd.

A. Samuelsen: Eisini vit vilja stýðja

hesa søk. Tað eru eisini fleiri aðrar sakir, sum ikki koma við í fyrstu 5 ára periodini. Og tær sakir, sum eru komnar við, er eingi hlívið burtur úr og vil eingi koma burtur úr teimum fyri tær summur, sum eru ansettar. Nú eru hesi 5 árini úti. Tí er tað natúrligt og neyðugt at ynskir koma frá øðrum plássum og har imillum hettar úr Hovi. Eg finni tað rímiligt, at allar tílíkar sakir behandlast undir eitt.

O. Effersøe: Det blev nævnt, at Spørgsmaalet om Motorbaadehavn i Hove havde foreligget i 1913. Spørgsmaalet har været fremme tidligere. Sagen er ældre. Den har været undersøgt af Palle Braun, og der foreligger Projekter og Tegninger. Dette Anlæg er af største Betydning for Hove, som har gode Udviklingsmuligheder, idet Bygden har en god Indmark og tillige har en dygtig Befolkning. Denne Bygd bør stilles lige saa godt som andre Bygder med Hensyn til Fiskeri. Jeg ved ikke, om Ansøgerne er klar over Situationen. Der kræves jo $^1/_3$ af Udgifterne fra den lokale Side. Vil Porkeri Sogns Kommune svare disse Udgifter? Man er gaaet ud fra, at den anden Del af denne Kommune ikke var saa interesseret, at man kunde stille Kommunen i Gæld. Men maaske Forholdene har forandret sig. Det vilde glæde mig. Jeg er klar over, at man maa kræve Havnesagen løst saaledes, at man siger, at de Havneanlæg, som ikke blev udført i 5 Aars Perioden, dem tager vi med i næste Periode. Priserne er endnu høje, men vil maaske falde en Del i de næste Par Aar. I den Tid kan man arbejde bedre paa Sagen.

D. J. Thomsen: Eg takki Effersøe fyri tað hann flytur fram í sakiri. Tað hugsi eg, at um Hov verður útskilt frá Porkeri, so eru teir klárir yvir at teir skulu betala. Annars hevur heila forstandarskapið skriva undir bønarbrævið.

O. Effersøe: Spørgsmaalet om Udskillelse af Hove som særligt Sogn synes mig at være afgjort.

Edv. Mortensen: Eitt brøv frá ministeriuum sýtir fyri, at Hov verður serlig sókn, men tað framgongur ikki hví. Eg veit ikki, um formaðurin nú kann geva upplýsing um tað.

Formaðurin: Efter Vedtagelsen ifjor i Tinget skulde der finde Forhandling Sted om Fastsættelse af Grænsen. Men det kunde man ikke blive enig om. Og her ligger rok Grunden.

O. Effersøe: Jeg finder, at dette Spørgsmaal maa tages op igen. Man maa faa at vide, hvad der er i Vejen. Jeg har hørt, at det er, fordi Landet paa den sydlige Side af Hovsbugten skal høre til Porkeri, og der bliver ingen Bebyggelse paa den Side. Jeg kan ikke tænke mig, at der skal blive bebygget. Jeg kan aldrig tænke mig, at der vil blive Bebyggelse der, som Forholdene er nu, for hele den anden Side af Fjorden egner sig langt bedre baade til Opdyrkning og Bebyggelse. Dette Spørgsmaal er vigtigt, og jeg maa ønske det ordentlig oplyst; saa kan vi tage Sagen op igen.

Edv. Mortensen: Eg skal samtykja tey úttalilsir, sýslumaður Effersøe framførdi, um at hetta var eitt umráðandi sak, og at hon nú krevjast væl upplýst. Vit mugu taka hana upp aftur í ár ella næsta ár.

Samtykt varð at heina málið í 5-mannanevnd.

. . . . . .

Havnabygging.

1. viðgerð.

J. H. Poulsen: Eg havi saman við tingmanni úr Vágum, R. Nielsen, vent mær til tingið við bon um at taka havnamálið upp aftur, ið nú hevir ligið stilt undir kríggunn. Hvussu líkindi eru fyri at fara at byggja havnir beint nú, er ikki gott at siga, ætlandi verður tað nakað dýrt, men eg meini, at málið er so stórt og umráðandi, at tingið má forhandla við ministeriið, um at tað verður uppaftur tikið. Tann økonomiska evnau í oyggjunum er ikki alla staðni vaxin í sama forhold sum prísurin á øllum er hækkaður, og tað er í hvussu er nógv plúss, ið tá ið henda lóg var til umrøðu seinast her í Føroyum, tóku sær uppá at lata ein fimting av útreisluni, ið nú ikki eru før fyri at taka hesa byrði uppá seg, tí hann samlaða útreisla verður so nógvar ferðir større enn ætlað av fyrstu tíð. Táið eg var í Keypmannahavn í vetur, spurdi eg vatnbyggingardirektør Westergaard um hetta mál. Hann segði, at hann vildi skriva

til ministeriið um tað í sumar, so tilboð kundi koma til heystar og tað kanska kundi farast undir arbeiðið til várs aftur. Hann helt sum eg, at tað var rímiligt, at ikki øll pláss kunnu taka ein fimting nú. Eg haldi, tó at gjort er gjort, og tað loysir seg ikki at tosa um tað, at tað var skeivt av tinginum at fastseta ein fimting at lata fyri øll pláss í Føroyum. Hetta er tíverri fastsett. Tað ið mest ræður um at gera nú, er at fáa málið roist aftur, og hetta er eitt mál, ið eg ikki ivist í, at allir tingnemm vilja styðja. Tað var vald ein fimmannanevnd til málið um motorbátahavn í Hovi, og skal mæla til, at hetta mál verður vist til sonu nevnd.

A. Samuelsen: Eg eri eisini her í tí heldugu situatión at kunna fylgja ordførarunum fyri fleirtalinum. Vit mugu hava sakina í útvalg, so vit skjótast kunnu fáa gjort nakað við hana. Sakin hevir forvorrað seg undir krígnum; tað er vael ringuri nú at fáa bygt havnir, enn undan krígnum. Tað er sum J. H. Poulsen sigir, at fimtingarnir verða nógv storri nú, enn teir vóru mottir til tá, tí útgiftirnar verða o. u. tína 4 ella 5 ferðir so stórar, sum tær vóru ætladar í lógini. Skulu vit fremja sakina í ár, so at tað kann teinkjast at fáa bevilling á komandi árs finanslóg, so mugu vit seta okkum í forbindilsi við kommunurnar og spyrja, nu tær vilja taka tann fimting, tær hava forpliktað seg til. Vit kunnu tíverri ikki siga nojaktiga frá hvussu stórir leir ymsu fimtingar verða, tí tað einasta eg havi at byggja uppá er eitt kortfattað úttalilsi frá einum ingenior hjá vatnbyggingardirektørinum, hvar hann heldur, at útgiftirnar sum heild verða so og so nógv procent storri enn ætlað av fyrstu tíð. Tá mugu vit hava bestemt tilsagn frá kommununum um at taka teirra fimting. Nakað annað er, at ministeriið, so vítt eg veit, ætlar at bjóða havnumælingini út til heystar, tá vil tað óivað visa seg, at tey eru dýrkøpi so nógv, at onkur kommuna fer at óttast fyri at taka sín fimting. Utvalgið má yvirveya, um vit skulu krevja detaljerað angovilsi av kostnaðinum, men um tað verður, vil tað forsinka hesum minst eitt ár. Løgtingið var jú ógviliga beteinkiligt við, at allar kommunur skuldu lata ein fimting antin tær vóru fátækar ella ríkar. Tað var fyrisligið at tann fimtingur, sum Føroyar skuldu betala, skuldi fordeilast ójavnt á kommunurnar eftir førimuni, so sumar kundu sleppa við einum tíggjunda parti. Eg venti, at løgtingið, um sakin skal fremjast, má fyritaka sær nakað bestemt fyri at styðja tær søknir, ið ikki eru muntar at lata ein fimting. Har var eisini, táið sakin var her seinast, talað um privat tilskot; og veit ikki, um tey standa við nakt enn; tey mugu eisini yvirveyast í nevndini, um tey kanska ikki behova at forask fram fyri ministeriinum. Tað er framført frá ymsum síðum, at tað kundi verið gingið fram á annan hátt enn tað er gjort; og havi reiðigerilsi frá ministaranum fyri, at forhøldini hava verið soleiðis, at eingin annar máti hevir verið.

D. J. Thomsen: Logtingið sendi íjor innstilling om at pieranleggið í Vági kundi koma í fyrstu rokkju saman við teimum sum lógu frá 1913. Jeg vil loyva mær at spyrja formannin um nakað fyriliggur hesum viðvíkjandi.

Formanden: Ministeriet har svaret, at der ikke kunde forelages nogen Ændringer i den Afgørelse, der forelaa i Loven angaaende Rækkefølgen, hvori Anlæggene skulde fremkomme. Iovrigt skal jeg undersøge dette Spørgsmaal nærmere.

Sagen er foreslaaet henvist til et Udvalg paa 5 Medlemmer. Forslaget betragtes som vedtaget uden Afstemning.

Avloka av ymsum forboðum.

1. viðgerð.

Edv. Mortensen: Í teimum krígsárum, ið farin eru, hava verið ásett ymisk forboð, sum okkum øllum er kunnugt; nú kundi kanska verið hóskandi at hugsa um at strika tey. Her at fara og tala um, hvørt einstakt kunngerilsi vildi tikið ovnógva tíð, og eg vildi tí hildið tað verið hóskandi, at tey øll vóru víst til vørunevndina at kanna eftir, um tey skulu strikast ella ei.

Tað er eitt annað spursmál, eg vildi sett fram til formannin. Tað er jú ein lóg komin í Danmark, sum ger broyting í lógina av 7. aug. 1914. Hvussu eru vit staddir eftir hesi lóg?

Formanden: Jeg er ikke i Stand til at besvare dette Spørgsmaal i Øjeblikket, men Udvalget vil faa Besked derom. Sagen

er foreslaaet henvist til Vareforsyningsudvalget.

Udenfor Dagsordenen skal jeg meddele, at Kreditforeningen har udstedt Obligation paa et Laan, foranlediget af Kobet af »Smirila. Forholdet er det, at det Varoudvalg, der af Lagtinget bemyndigedes til Optagelse af Laanet, nu er opløst, og det nuværende Udvalg har ikke Bemyndigelse til at underskrive Obligationen. Der er fremsat Forslag om, at Lagtinget bemyndiger det nuværende Vareforsyningsudvalg til at underskrive den af Kreditforeningen udstedte Obligation.

A. Samuelsen: Principielt havi eg einki ímóti hesum forslag, líkasælttið sum eg hava nakað ímóti at »Smirila var keyptur alla at tað var givið somikið fyri hann. Men eg eri ímóti at útvalgið hevur lánt hesar pengar uttanvíðari, uttan at geva tinginum leyligheit til at úttala seg um vilkorini fyri hesum láni. Tað hevur tó altíð verið gjørt fyrr og teir høvdu haft stundir at bíða, tí sjálvtum »Smirila var keyptar, skulu pengarnir ikki betalast fyrrenn 1. apríl næsta ár. Eg visti ikki av at formaðurin fór at seta hetta forslagið fram til beslutning; annars kundi eg nokk ynskt at tosa við mínar partímenn um hetta fyrst. Tó skal eg siga, at tað sikkurt ikki vil føra til at vit nokta at vera við.

Edv. Mortensen: Eg skilji ikki, hví hr. Samuelsen gor hasar athugingar, tí ífjor samtykti jú løgtingið, at »Vareforsyningen bemyndiges til at optage det til Kobet nødvendige Laans. Og lán kann nú einaferð ikki upptakast uttan troytir.

Formaðurin: Sælgerne af »Smirila. A/S. Mortensen, har stillet sig saa imødekommende, at Købesummen ikke fordres betalt før 1. April n. A. Følgelig er der intet til Hinder for at undersoge, om man mulig kan opnaa en bedre Ordning andetsteds med Hensyn til Laanebetingelserne. Dette Forslag til Beslutning vil i Honhold til Forretningsordenen undergaa to Behandlinger, og i Mellemtiden vil det kunne drøftes indenfor Partierne. Her foreligger absolut ingen Krachsituation.

A. Samuelsen: Eg má halda uppá at tað tykist undarligt at útvalgið beint frammanundan tingsamlingini hevur avslutta hetta lánið; tað kundi jú tonkst, at vit kundu fingið lagaligari vilkor aðra staðni. Tað er í hvussu er keðiligt, at vit hara skulu hava honda eitt vegin at ganga. Men eftir tí, sum formaðurin upplýsir, er spursmálið jú opið framdeilis.

Edv. Mortensen: Tá vorumevndin samanr við amtmanninum hevði fingið uppí hendi at keypa og taka lán hartil, máttu vit altfyrieitt hugsa um, hvar og hvussu vit skuldu fáa pengarnar til tað. Tað var okkara plikt.

M. A. Winther: Samuelsen vil minnast, at vit í sínari tíð forhoyrdu okkum hjá ymsum láns-institutiónum, tá vit skuldu upptaka lán, men síðani vit blivu limir av kreditforeiningini, hava vit einki lán tikið uttan har. Og eg trúgvi tað er eitt góður vegur at vit halda okkum har. Lántreytirnar eru so lagaligar, at vit neyvan fáa tær betri nðrastaðni, í hvussu er skulu vit so hava kreditforeiningins samtykki og alt dregur út.

A. Samuelsen: Eg haldi tvørtímóti at tað er ógviliga óheldugt, at vit binda okkum so fast at kreditforeiningini; og veit ikki, men eg havi eitt vissan formóðning um, at vit kunnu fingið bíligari pengar aðrastaðni. Amtskommunan er nú hart spent fyri; aleina til skipakeyp skulu vit hava lán til o. u. ½ millión. Vit eru blivnir nakað geldbundnir eftirhondini og koma meir og meir yvir í hendurnar á Kreditforeningen for Kommunerne i Danmark.

M. A. Winther: Samuelsen vil heldur hava okkum í aðrar hendur; eg hugsi vit eru betur staddir sum er. Tað er gott vit hava fingið eina so rímiliga tíð til at umraða okkum í ádrenn vit avreiða obligatiónirnar. Tað kann betýða nakað. Tað er ikki eitt og hvør, ið kann leita til kreditforeiningina, og tað er ótilráðiligt hjá okkum at fara aðrastaðni soleingi tað ikki geldur storri lán.

O. Effersøe: Jeg kan minnes, at jeg har last í et Blad at sagkyndige mener, at Kreditforeningsobligationer vildo falda i en nær Framtid.

A. Samuelsen: Eg vil slá fast, at vorumevndin og amtmaðurin ikki hava skaffa lán aðrastaðni enn hjá kreditforeiningini.

M. A. Winther: Tað er rætt og einki at siga til. Til Effersøe kann eg siga, at tað er natúrligt, at kursurin er niðurgangandi. Tað eru altso ikki góð líkindi at selja obligasjónir. Tí mugu vit hava eitt mann,

sum kan siga okkum, nær vit skulu selja. Vit mugu ikki fara og selja til óbelejligar tíðir, men ansa eftir. Man nýtir ikki at selja alt isenn. Eg hopi at teir sum koma at vera finantsmenn fara at hava eyga fyri hesum.

O. Effersøe: Jeg sigter ikke til Klipning, men til den almindelige Tendens. I det Tidsrum, vi skal sælge, er der Udsigt til, at Obligationerne skal falde.

A. Samuelsen: Eg gloymdi at spyrja um tær 3—400,000 kr., sum vit hava lánt, ikki eisini eru frá kreditforeiningini í Danmark. Vit kunnu tá selja og fáa góðan vinning ella, rímeligvis tap.

M. A. Winther: Eg kom inn á hetta tí Effersøe nevndi um kursin. Tað er einki órímiligt, at vit diskutera uo hetta.

Sakin fór til 2. viðgerðar.

Formaðurin: Fra Lervig Sogn er fremkommet Ansøgning den 2. August. Denne vil blive betraglet som indkommen i rette Tid, om Tinget ikke har noget derimod.

O. Effersøe: Jeg ønsker at spørge Formanden, hvad Ansøgningen gaar ud paa.

Formaðurin: Den gaar ud paa Opførelse af en Skolebygning. Tilligc er der indkommet Skrivelse fra Ingeniør Jacobsen med Ansøgning om at fratræde sin Stilling fra 1. Oktober i Aar.

Fundur miðvikudag 13. august.

Frásogn sanatorinevndarinnar.

1. viðgerð.

Nyholm Debess: Her fyriliggur frá nevndini ein frágreiðing um, hvat er gjørt sanatoriinum viðvíkjandi síðani seinastu ordineru tingsetu. Ífjør var tikið eitt sýni har uppi, og tað vísti, at har var nógv, ið skuldi bøtast um. Hetta kravdi nógv av peningi, tí tær almindiligu reparatiónirnar vildu krevja 10,000 kr., umframt at har kravdist til sovorðið, sum tyktist nevndini neyðugt at gera, einar 2,000 kr. Krigssituatiónin forðaði fyri at fáa keypt tað, ið almindiliga skuldi nýtast til hesi arbeiði. Nevndin meinti, at tað var óforsvarligt at siga beinleiðis, at einki skuldi verða gjørt, tí so vildi enn meiri spillast. Nevndin kom so á samt um at fyritaka umvolingar har uppi fyri 1,000 kr., tað helt man vera tað minsta, ið var forsvarligt at brúka. Tað sum vit í nevndini hava haft mest stríð og fortreð av, er doktaraloysið á sanatoriinum. Í fjør leyst, tá dr. Hansen hevði sagt seg frá og fór til Danmarkar, fekk hann ein doktara fyri seg, og hann sat her o. u. ein mánað. Við hann hevði nevndin fund og hoyrdi hansara meining um, hvat ið kundi gerast við sanatoriið. Hann meinti, at hann í teirri stuttu tíð, hann kom at sita har, ikki kundi gera stórvegis broytingar, tí hann visti ikki, um næsti maður vildi vera samsintur við hann, men hann helt seg siggja, at nógv átti at broytast. Spurningurin um tann máta, Dánjal Hoydal er lontur á, hevir nevndin haft til umræðu fyrr, og vit meintu, at tað var heldigari, um nakað var broytt, tí man heldur tað vera óheldugt, at hann er lontur so lítið, samtíðis við, at hann hevir vissar rættigheitir har uppi, t. d. til at halda kúgv, sláa gras og velta eplir. Hetta hevði man frammi fyri dr. Jørgensen, og hann meinti eisini, at hetta mátti broytast soleiðis, at Hoydal fekk meiri løn. Hesin læknin undraðist yvir, at tað stóra arogl, ið liggur utan um, ikki var nýtt til nakað, tað er jú so, at sanatoriið ið átti at kunna klára seg við mongum vorum, noyðist at keypa eplir og annað tíljkt. Hann helt eisini at tað var neyðugt, at har situr ein lækni, ið hevir forstáilsi av tí heila og interessu fyri tí. Jørgensen fór og tveir læknar soktu aftur. Fyrst dr. Hansen ið hevði verið og so dr. Jónsson úr Sandoy. Dr. Hansen tók stutt eftir sína ansokning aftur. Tað var so viðtikið at bíða til 1. novembir. Men tað leið út í januar og eingin var útnevndur. Í nevndini vóru vit ógvuliga kaldir av hesum, tí vit meintu, at hvør dagur, ið gekk, og eingin doktari var, fordi við sær, at meiri og meiri kom upp í fløkju. So kom bræv frá dr. Heerup, har han fyrislær at sláa embætið upp aftur ledigt við størri løn. Hetta dámdi lítið nevndini, tí dr. Jónsson vildi taka tað við tí løn, ið var, og man helt tað vera løgið at fáa slíkt bræv frá landslæknanum. Stutt eftir tók dr. Jónsson sína ansøkning aftur. So var hildin fundur við fysikus og býráðsformanninum; har

var bara ein nevndarmaður til stedar. Har framhelt landslæknin, at hann var vissur í, at um garantiin var sett upp til 6– 7,000 kr., og ein lokni, ið kom higar úr Danmork, kundi fáa nakað av sínum forðaútreiðslum afturrinduð, vilduóivað fleiri danskir læknar sokja. Við tað at Havnar býráð gekk við til at hækka garantiina til 7,000 kr. og læknatrotið var so stórt, helt nevndin seg ikki kunna forsvara ikki at ganga við hertil. Embretið var aftur uppsligið leligt. Eingin lokni sokti úr Danmork. Tað er øllum kunnugt, at nú í eygablikkinum er dr. Jónsson ansettur. Tá ið hann var komin higar, lievði nevndin fund við honum; hann helt seg hava verið ov stutt eur, til at hann kundi gera nakað uppskot til broytingar tá, men nevndin bað hann hava eitt uppskot liðugt til miðjuna av august mánaði.

Soleiðis er standurin, og við tað vit ikki hava fingið hin nýggja læknan fyrrenn fyri kortum hava vit ikki verið forir fyri at leggja fram nakað bestemt uppskot, hvaruppá moguligar broytingar kunnu byggjast. Viðvíkjandi tí areali, sum liggur ónýtt haruppi, hevur nevndin gjørt samtykt um at sundoggja ein urtagarð, so sanatoriið ikki skal nýta at fara aðrastaðni at keypa tær grøntsakir, ið torva. Til at fyrireika og stíla fyri hesum hava vit heitt á ein so koman mann sum landbrúkskonsulentin. Tað eru sjálvsagt vmiskir aðrir spurningar, nevndin hevur hatt til umhugsan, men allir kosta pengar og pengatrot er: vit hava tí ikki hildið okkum væl kunna disponera yvir miðlum, sum ikki eru tilstedar. Eitt undantakilsi er tó: Vit hava keypt jarnbeslag og hjól til ein lýkvogn. Tað hevur leingi verið almindiligt samtaluevni í Havn, hvorja ferð sanatoriivognurin kom við einum líki, at hesin sami vognur skuldi verða nýttur til at keypa matvorur í. Her hevur nevndin altso disponerað yvir nokrum pengum, men tað er ikki so stórt.

Her er nú í stórum sagt frá tí, sum milhuntingarnevndin hevur gjort. Seinri hava vit givið eina frágreiðing til professaran Faber, ið var boruppi saman við tveimum øðrum læknakonum monnum. Hann vildi gjarna fáa at vita, hvussu tann ekonomiski standurin var, hvatið ætlað var skuldi gerast og hvatið manglaði. Hann var ikki útsendur av nokrum, men ynskti hesar upplýsingar av interessu fyri sakini. Utvalgið helt tí ikki at her var nokur grund til ikki at geva honum hesar upplýsingar. Har var tí nakað upsett. Tað kann kanska diskuterast, um tey tal, her eru sett, eru heilt nojaktug. Tá her eru nevndir yrniskir postar, so betýðir tað í hvussu er, at hvor postur in reprosenterar nakað, sum eigur at verða gjort. Tað er eitt stórt belob, tá alt er samanlagt. Umframt driftsundirskotið í 1917 -18 áttu at verið nýttar 44,000 kr. og hertil komur aftrat eitt undirskot stórt 16,000 kr. Tilsamans skuldu vit til sanatoriið haft o. u. 60,000 kr. Tað er beteinkiligt, at vit skulu vera komnir útfyri so stórar útgiftir og givið er tað, at um tað í góðari tíð var fyritikið eitt og annað, sum átti at verið gjort vóru nógvir av hesum postunum nú lópin smærri. At driftsundirskotið er stórt, er natúrligt, tí meðan inntøkurnar hava verið tær somu, eru útreiðslurnar vaksnar ófort hesi seinastu árini. Árið 1914 vísir eitt sokallað yvirskot uppá 3,000 kr. — bentart hevði tað verið um hesir pengarnir hovdu verið nýttir tá, so kanska vil nú hovdu haft 10,000 Kr. minni at botala.

Tingið var ífjor biðið um saman við amtmanninum at sokja til regoringina um eitt extraordinert tilskot til sanatoriið. Amtmaðurin lovaði ífjor heyst, tá hann fór niður til Danmarkar at undirsokja tær moguligheitir, ið kundu vera tilstedar fyri at fáa eitt slíkt tilskot. Hvorvitt nakað resultat hesum viðvíkjandi fyriliggur, er mær og nevndini ókunnugt, men tað kann amtmaðurin upplýsa, um hann vil.

Her er so í stórum greitt frá hvat gingið hevur fyri seg í nevndini, sum sitið hevur. Utvalgið heldur hinda spurning vera ógviliga lýdningarmiklan og vrntar at tingmenn vilja taka væl undir við tí rætta forstáilsi og góðum vilja til at fáa so gott úrslit sum gjørligt, og til tess niðursetta eina 5-mannanevnd í hesi sok.

H. C. H.-Tórgarð: Eg havi ikki stórt at tilføva til tað útvalgsformaðurin hevur sagt. Tær dispositiónir, ið troknar eru, eru fyritikmar í fullari einigheit okkara millum; við hava meint, at her var allur annleidningur til at gera meir, men hava raðst útreiðslurnar. Eg vil stydja uppskotið um at senda spursmálið í eina 5-mannanevnd. Allir eru vit væl klárir yvir, hvussu stórt hetta spursmálið er og at tað krevur stórt forstáilsi og stórt arbeiði av útvalginum. Tað hevði tí verið hent um so nógvir tingmenn sum moguligt útfalaðu síma hugsan um, hvat gerast skal. Viðvíkjandi statstilskoti, ið søkt var um, hava vit ikki sendað nakað til, hvar tað er blivið av og eg vil tí biðja formannin upplýsa um, hvussu vorðið er við tí.

Formaðurin: Spørgsmaalet om et ekstraordinært Statstilskud blev bragt frem for Ministeriet i Efteraaret. Imidlertid har der fundet en Undersøgelse Sted angaaende forskellige sanitære Forhold, og forinden man har set Resultatet af d'Herrers Indberetninger, forekommer det mig ikke praktisk at optage Spørgsmaalet. Jeg anser det imidlertid for rimeligt, at dette Laan vil blive betragtet som en Statsopgave, og at Andragendet vil blive imødekommet, men i hvilket Omfang skal jeg ikke udtale mig om.

M. A. Winther: Vit eru óivað allir interesseraðir í at hesi forhold kunnu bliva so góð sum møguligt, og at sanatoriið samtíðis økonomiskt má kunna bjarga sær. Eg sá í einum berætningi at tey undirskot, sanatoriini í Danmark hava haft, hava verið dekkað av statinum, og tað sama vil eg vænta verður tilfelli her. Við siðuna av hesum spurningunum er tað ein annar, hin mest týdningarmikli, um sanatoriið verður leitt sum tað eigur at vera av teimum, sum sita haruppi, um tann dagliga tilgongdin er tilfriðsstillandi, um har ikki er bæði eitt og annað, sum verður misrokt. Er nógv av hesum, sum nú er framdrigið, ikki slíkt sum kundi og átti at verið undgingið, um tað hevði verið gjørt í rímiligari tíð? Tað er við hesum sum altið við slíkum umbotingum: Jú longur ein útsetur tær tess dýrari verða tær. Tað, sum fár kostar 4,000 kr., kann næsta ár kanska kosta einar 6,000 kr., sonógv er tað blivið forringa við at drála. Tað tykist undarligt, at vit skulu vera komnir at standa yvirfyri reparatiónum til 50,000 kr.; tað kundu vit jú bygt ein stóran bygging fyri. Og hvussuleiðis skulu vit dekka hesar útreiðslur? Við láni? Tað er nøyvan væl hóskandi at gottgera reparatiónsútgiftir við láni.

Eg vil spyrja, hvat ið ætlast at gerast við reparatiónirnar og hvaðani frá kostnaðurin til tær skal takast. Og síðani er spurningurin um at fáa lønirnar uppsettar, ein spurningur sum nevndin ikki hevur tikið støðu til. Nevndin hevur hvørki í ár ella annað ár hæðka lønirnar, so at undirskotið ikki kann voldast av hesum. Undirskotið má vera av tí, at lívsforneyðugheitirnar nú eru so dýrar. Tað var yvirskot í 1915, tá prísirnir váru sum lægstir. Tá var yvirskot. Men framman undan, í 1909, 1910 og 1911 var undirskot, sum varð afturgoldið frá statinum. So er spurningurin um tað annars er væl vorðið á sanatoriinum. Tað er soleiðis, at læknin, sum nú er ikki hevur útdannilsi sum sanatoriilækni. Er tað ætlanin at hann skal fara til eitt kursus fyri at fáa sær hetta útdannilsi? Vit kunnu ikki forsvara at leiðilsi av sanatoriinum er í ringum lagi, um tað skuldi verið so; men eg veit ikki, hvussu tað í so máta standur til har uppi. Í hvussu er mugu vit sum tingmenn standa til svars fyri tí, sum hendir har uppi.

V. Debess: Tað er rætt sum sísti ræðarin tók fram, at eg hevði gloymt at frambera um lønviðureskiftini. Eitt brævi liggur fyri frá landslæknanum at sjúkarøktarskur, økonomur og lærlingar mugu fáa hægri løn frá 1. apríl 1918. Nevndin hevur ikki viljað tikið støðu til hetta, men ber tað fram fyri tingið. Tað er soleiðis ikki lønhæðkan, sum hevur nakað við undirskotið at gera. Við ásetan av læknanum eru tær treytir álagdar, at hann skal fara niður til Danmarkar á eitt 3 mánaða kursus á einum av nationalforeiningsins sanatorium. Men nevndin var samsint við læknan um, at tað var betri, at hann fyrst kendi nakað væl til viðurskiftini her, so hann betur og gjøllari kunni siggja teir vnusar sum har kunna vera. Um sanatoriið verður forsvarligt drivið av sjúkarøktarskum og økonomum kann nevndin ikki væl úttala seg um. Tað má jú serliga vera gjøgnum tann fasta læknan, at ein kann hava garanti fyri at sanatoriið verður drivið forsvarliga. Tað er vnist sum fólk bora sanatoriinum. Nevndin kann ikki fara eftir tí. Tá einki liggur fyri nevndini frá bestemtum persóni, so kann nevndin ikki geva ti gotar.

A. Samuelsen: Eg siggi í hesi frágreiðing frá sanatoriinevndini, at nevndin hevur sent ein útførligan frágreiðing um standin á sanatoriinum til professor Faber á víkshospitalinum. Hevur Faber bidið um hetta ella vil nevndarformaðurin greiða frá, um Faber hevur skrivað eitt ella annað til nevndina um at hann ætlar sær at gera nakað serligt við sanatoriið? Nevndarformaðurin hevur lagt sær eina við at mála upp undirskotið og annað og greiða frá, hvat her skal gerast og lagt alt hetta fram fyri hesum manni. Eg gangi út frá, at men ikki vil gera soleiðis yvirfyri hvørjum og einum manni.

Nyholm Debess: Eg kæri meg um, at hesin síðsti ræðarin ikki var inni, tá eg greiddi

frá hesum viðurskifti; annars hevur tingsins formaður svarað á spurningin umframt tað sum eg havi flutt framm í míni fyrstu røðu. A. Samuelsen sigir, at nevndin hevur lagt sær eina við at rokna upp alt tað ófordeilaktiga. Tað sum er frágreitt, er ikki við nítt vitandi ætlað til at vera roknað uppá nakað serligt, uttan at gova eitt greitt og satt bíleti av tí standi, sum er á sanatoriinum. A. Samuelsen plagar annars at klaga um, at sakir ikki eru nóg væl upplýstar, og tá hann nú fær góðar upplýsingar framlagdar, er hann heldur ikki tilfriðs; so tað tykist ilt at arbeiði honum til vildar.

O. Effersøe: Det har gaaet ret galt med Hensyn til det økonomiske ved Sanatoriet i ffere Aar; men nu er det galt igen. Ifjor begyndte det at gaa ned ad Bakke. Man siger, at Aarsagen er, at der er gjort saa lidt i forgaaende Aar, og saa, at det skyldes Prisstigningen. I de tidligere Aar 1908—1910 var der Underskud paa 10,000 Kr. I 1910—11 var der ogsaa Underskud. men i 1912 var der Overskud, og derefter var der meget smaa Underskud. Der blev i sin Tid foretaget Undersøgelse om Driften deroppe. Resultatet blev sendt til Danmark, og man fik da Klarhed over, paa hvilke Poster der blev brugt for meget. Deraf fik man en bedre Økonomi, dog uden at Patienterne led noget derved. Har man gjort det samme nu? Jeg har det Indtryk, at man er noget flot anlagt. Der bør passes paa. Hvad angaar andre Udgifter som Reparationsudgifter, saa er det naturligvis ufornuftigt at vente med at reparere, om Bygningen skulde lide Skade ved at man ventede. Jeg vil her fremdrage noget: En saa stor Bygning opført af Tømmer vil faa Skavanker, som hurtig bliver mere og mere mærkbare. Man maa derfor passe paa, at Skaderne ikke bliver alvorlige. Det vil ikke i længden nytte, at man bliver ved med at male og male Træværket. Man bør heller belægge det hele med Belgeblik. Det kan ellers ikke lønne sig stadig at reparere Bygningen som den er. Hvis man slaar ind paa denne Vej, vil man meget sandsynligt kunne begrænse Udgifterne til Reparationer.

A. Samuelsen: Eg kann ikki skilja frágreiðingina frá Debess. Eg spurdi, hví Faber hevur fingið so nógvar upplýsingar. Her fekk eg ikki upplýsing frá Debess. Eg má so lata meg nøja við referatið og vita, um spurningurin sæst besvaraður har. Meðan tað einaferð hendi hjá mær ikki at vera tilstaddur í salinum, so hevur slíkt oftа hent hjá nevndarformanninum. Eg veit altso ikki, av hvat grund mun hevur givið Faber upplýsingar. Tingmenn eiga at fáa upplýsingar. Men Faber er ikki tingmaður.

Eg vil gjarna vita, um N. Debess hevir forklárað hví, ella um hann kann forklára hví prof. Faber, sum er ein av oddamonnunum í nationalforeiningini, hevir interesserað seg so nógv fyri okkara sanatorium, ella kanska formaðurin, um hann er blíðkaður aftur, vil svara uppá hetta.

Edv. Mortensen: Formaðurin fyri miðlumtinganevndini framhelt, at tað kemur nógv an uppá at hava ein góðan lækna á sanatoriinum, og hann nevndi tað sum eitt brek við driftina, at har hevir verið lækna leysi so leingi. Eg dugi væl at skilja, at hadda hevir verið eitt stórt sakn. Í samanburði við frágreiðing nevndarinnar má eg siga, at landslæknin hevir stillað seg nakað merkiliga til hesa sak. Her sókti ein lækni úr Føroyum, og eg dugi ikki betri at sigggja enn, at nationalforeiningin hevir anbefallað henda mann við teim treytum, at hann skuldi sokja 3 mánaða lærdóm extra í Danmark. Men so kemur har eitt bræv av 27. desbr. 1918 frá dr. Haerup, har hann sigir: »I Betragtning af, at Tuberkulose er en meget udbredt Sygdom her paa Øerne, maa man meget beklage, at Nationalforeningen til Tuberkulosens Bekæmpelse ikke har set sig i Stand til at indstille Dr. Jónsson til Stillingen...« Hann mælir so til at sláa embætið upp aftur. Dr. Jónsson tók so ansøkning sína aftur: við goðari grund haldi eg. Eg meini, at ein kann finnast at landslæknanum fyri hetta, at hann hevir sinkað nevndini í at fáa lækna og harvið skaða driftini av sanatoriinum.

S. P. á Konoy: Uttan at vilja fyrigripa, hvat formaðurin kanska vil siga, skal eg svara Andrassi Sámabesyni, tá hann spyr, hví prof. Faber er so interesseraður í okkara sanatorium. Eg undrist kortini yvir, at nakar tingmaður kann spyrja soleiðis. Vit vita, at »Nationalforeningen til Tuberkulosens Bekæmpelse i Danmark« hevir haft nógv at gera við okkara sanatorium. Teir hava givið tilskot til okkara árliga, teir ásettu, hvar sanatoriið skuldi liggja, og tað mátti ikki tykst nøkrum manni løgið, at prof. Faber, sum er fremstimaður felagsins, má vera sterkt interesseraður í okkara bróstsjúkuhúsi. Eg havi givið honum

munuligar og skriftligar upplýsingar, og eg var fegin við at læra honda mann at kenna, ið av ollum heldust at vera ein kapacitet, hvat ið viðvikir bróstsjúkuheilsubót. Eg haldi, at vit serliga skulu hakka okkum mer upp at sovorðnum monnum, ið vilja okkum vel og kunnu hjálpa okkum. Effersoe sagði, at driftin var nakað flott; eftir tí eg kenni til tað, kann eingi verða flottað við uttan til matna, men tað vita vit oll, at bróstsjúkusjúklingar skulu hava gott at eta, so tað má ikki sparast soleiðis uppá matin, at tað gongur út yvir sjúklingarnar. Sýslumaður Winther framhelt, at logtingið bar ansvarið. Ja, sjálvandi. Tað hava verið tankar frammi um at nationalforeiningin skuldi yvirtaka bóstsjúkuhúsið, men eg meini, at vit her í Foroyum skulu ikki geva ansvarið frá okkum. Mín kansleiki til nationalforeiningina er, at hon er Danmork til hjálpar ant fyri ant, men vit hava onga deild av henni her. Nakað annað er, at nationalforeiningin til einahverja tíð vil vera okkum til hjálpar við ráð og dáð, og tað eiga vit at takka fyri. Eitt annað, ið var vert at lugsa um, er, um honda nevnd eigir at vera samansett eftir politiskum linjum, soleiðis, at tað altíð skal vera tann partur ið hevir fleirtal á tingi, ið hevir fleirtal í nevndini, tað var kanska betri, um menn her sótu longri í nevndini, so teir vóru reiðiliga konir í hesum máli. Tó má eg siga, at eg, í teirri tíð, eg havi verið í nevndini frá 1914 til nú, havi ongar roymdir av, at politikkur hevir verið drivin í nevndini. Men vit kundu kanska lugsa um, vit skuldu hatt eina aðra samansoting av nevndini. Eg trúgvi, at vit fáa umbatingarnar í lag, táið logtingsmenn skilja, hvussu neyðsynlar tær eru.

Formaðurin: Med Hensyn til Spørgsmaalet om, hvad der foregik, da Stillingen som Sanatorielæge første Gang var opslaaet, forelaa der en Skrivelse fra Nationalforeningen, hvori udtales, at man kendte ikke Dr. Jónsson og derfor hverken vilde tilraade eller fraraade hans Ansættelse, men at man var villig til at give ham Lejlighed til et 3 Maaneders Specialkursus i Danmark. Jeg kan ikke indromme Rigtigheden af den Kritik, der er rejst mod Fysikus i dette Spørgsmaal. Han foreslog jo blot at prøve paa at faa flere Ansøgere, saa der blev nogle at vælge imellem. Dette skal ikke være en Kritik af Dr. Jónsson, men man maa fastholde, at han var ikke specialuddannet Sanatorielæge, og man maa indrømme, at en Specialist maa være at foretrække. Der er vel Fysikus' Henstilling sket det, at der gik længere Tid til Stillingen blev besat end ellers, men jeg tror ikke, at der derved er sket noget, der har forværret Forholdene paa Sanatoriet, hvad Driften angaar.

Nyholm Debess: Tingformaðurin hevir svarað uppá tað, Edw. Mortensen spurdi meg um, og tað var beint. Sunnheitsstýrið anbefalladi læknan, men nationalforeiningin tók ikki stoðu: teir misanbefallaðu hann tó als ikki. Táið tingformaðurin helt, at hetta forhold, at menn ikki hevir haft ein fastan lækna á sanatoriinum, ikki hevir havt nakra ávirkan uppá driftina, so meini eg, at tað er ikki at ivast í, at har er nógv ið kann broytast, sum vil fora til at nøttiliga stór helop kunnu sparast gjognum tíðirnar, og hetta kann ikki gerast uttan ein fastur lækni er settur. Sjálvsagt vildu tílíkar broytingar kosta penning at fáa í lag, men tað vil vinnast inn aftur. Eg fekk te upplatan av hr. Effersoe, at hann meinar, at sanatoriið hevir verið væl drivið árini frammanundan, men ónatúrliga illa tey seinastu árini. Av teirri ekonomisku frágreiðing sær mann, at sanatoriið hevir givið yvirskot í 1914, ja, men tað var tí mann forsendi at gera mangt ið átti at vera gjort, og sum, um tað hevði verið gjort tá, hevði spart okkum fyri teim flestu av teim brekum, vit nu standa yvir fyri har uppi. Um yvirskotið var nýtt til umvolingar í 1915, so hevdu vit nú spart nógvar pengar, fyrst hevði arbeiðið verið billigari, og undramt hevir tann langa tíð, ið er gingin, fort til, at nógv ið kundi verið lagt um, nú er heilt oyðilagt. Effersoe helt nú um dagirnar, at tað var ynskjandi, at tað mátti gangast sanatoriinum eins væl og telefonini: tað kann ikki samanliknast.

H. J. Winther: Eg má eisini tala at hr. Effersoe tá hann sigir, at skyldin fyri, at tað gekkst sanatoriinum væl, var hjá sambandinum og fyri at tað gongst ti illa hjá sjálvstýrismonnum. Hann nevnir sum orsakir til, at tað nú gongst illa: »Dyrtiden og tidligere Aars Forsommelsere. Ja, dýrtiðin fór fyrst at virka, tá ið tey niðurgangandi árini komu, og tá fóru teir at lugsa um at hjálpa okkum niðri í Danmork. Effersoe gevur stidligere Aars Forsommelsere skyldina, ja, tað er rætt: tað hevir verið ein vilji hjá sambandinum til at prossa eitt yvirskot út av sanatoriinum, og tað hevir gingið út yvir driftina. Tað

sleppst ikki uttanum, at hetta ringa skil hevur sín uppruna í sum skrivað er; *tidligere* Aars Forsømmelser. Har *skuldi* pressast eitt »yvirskot« fram á sanatoriiroknskapinum, tessvegna vóru troytir settar á doktor Hansen um at spara bæði her og har. Sjálvsagt gekk hetta fyrst og fremst útyvir patientarnar og tað hevur tí heldur ikki verið sjáldsamt at hoyra klagur frá teimum. Hr. Effersøe tekur til doktar Hansen, men hann má minnast til, at hesin sami doktar Hansen sat eisini í 1917—18, tá undirskotið framkom uppá 9,000 kr. Útvalgið framskaffar jú eitki undirskot, tað má doktarin, ekonoman og tey, ið standa fyri tí daglign tilgongdini, svara til. Tað kann gott vera, at fysikus er flottari enn hin var, men tað skal ikki leggjast honum til last; her hevur verið altfor nógv tosað um sparsemi, og tað er blivið stórliga missbrúkt. Eg havi sagt við dr. Jónsson, at hvar hann fann nakað at finnast at, so mátti hann bera okkum boð um tað. Ja, sigur hann, teir tosa um at spara, men og dugi illa at fata hvussu man kann forsvara at brúka knípari tá talan er um at fáast við tuberkulosupatientar; har tað skuldi rátt um framum alt at gjort teimum tilveruna so ljósa sum møguligt. Hvussu ofta hevur man ikki hoyrt sanatoriipatientar tosa um, hvat hjálp tað hevur verið teimum at fáa eitt og annað gott, egg o. t. sendandi heimanífrá! Góður, leskiligur matur, góður passningur o. s. fr., alt slíkt ger teimum tað betrari at fola seg væl, og tað ræður nógv um.

Eg kann ikki lata vera eina ferð enn at nerta við forholdið við dr. Jónsson: tað er eftir mínari meining einki skil á sum her er atborið. Hann sokti seg frían frá Sandi fyri at koma til Havnar tíðliga ífjør, men tað dróg út og dróg út, tó alt tyktist at liggja greitt fyri: hann fekk einki svar. Eg spurdi hann tíðum hvussu hetta bar til. Eg veit ikki, svarnaði hann, men tað sýnist sum har eru kreftir, ið arbeiða ímóti mær. Og tað tyktist vera sjónligt at teir ikki vildu hava hann til Havnar. So gjørdu vit á Sandi stutt av og buðu honum 1,000 kr. aftrat lønini, og so settist hann aftur. Men eg havi eitt anilsi um, at tað eru teir somu menninir, sum ikki vildu hava hann í vetur, tí teir ikki hildu hann vera brúkuligan, ið nú hava tikið hann frá okkum. Nú sita vit har í Sandoynni í doktaraloysi og ikki er gott at vita, nær vit fáa nakran aftur; tað er munur á at fáa doktara til Havnar og til Sandoyar. Her hava teir ráðandi borið sog illa at, ikki minst móti Sandingum. Sum lækni er Jónsson av teim fregu í Føroyum, sjálvt um hann kanska ikki er serliga kvalificeraður til sanatoriilækna, tí er saknið eisini somikið stort í.

Her er so nógv at gera í hesum spurningi, bæði í oin og annan máta, at tað ikki er nógmikið at tosa um at spara - - til skaða fyri sjúklingarnar! Hetta sparsemi hevur forsømt og forkomið so nógv av nógv.

Formæðurin: Hvad angaar Forholdet med Ansættelsen af Sanatorielægen er det jo saaledes, at det er en Betingelse for Ansættelsen, at Sundhedsstyrelsen og Nationalforeningen bliver adspurgt forinden. Grunden til, at det truk ud med Dr. Jónssons Ansættelse var ikke den, at der blev arbejdet imod ham, men der maatte indhentes Erklæringer fra Sundhedsstyrelsen og Nationalforeningen, og Postgangen var jo den Gang ret uregelmæssig. I Modsætning til Hr. Winther mener jeg, at Dr. Jónsson er meget godt kvalificeret som Sanatorielæge, men det vilde dog være en Fordel at have en Specialist.

Nyholm Debess: Tá formaðurin nú fyri nógv ferð nevnir hetta um ein specialist, so má eg siga, at tað er nakað, ið er ókunnugt fyri mær og útvalginum, at her hevur verið talað um at fáa ein slíkan til sanatoriið. Har hevur ongatíð sitið nakar specialistur, men bert ein lækni við einum framúrhjá útdanmilsi. Skuldi sanatoriilæknin verið specialistur, kundi hann ikki verið kommunulækni, so bleiv hann bara við sanatoriið. Hetta hevur ongatíð mær vitandi verið til umræðu, hvorki í nevndini, hýsáðnum ella hjá landslæknanum.

Formæðurin: Vel Specialist forstaar jeg en Læge med videregaaende Uddannelse end de foreskrevne 3 Maaneder.

O. Effersøe: Man skulde efter de fremkomne Udtalelser fra d'Hrr. Winther og Debess tro, at mine Ønsker kun gik i Retning af at spare saa meget som muligt til Skade for Patienterne, mens de derimod har saa umaadelig meget tilovers for dem, ønsker dem god Mad og alt andet godt. Det er ingenlunde saa. Jeg staar lige saa lidt fremmed overfor disse Forhold, som Folk i Almindelighed, men derfor er det aldeles ikke hen i Vejret, naar jeg har advaret mod unødig Flothed. Det har jeg gjort tidligere og har konstateret, at

saadan Flothed var til Stede i Sanatoriets daglige Drift. De samme Personer som dengang er endnu til Stede deroppe. Derfor har jeg tilladt mig at spørge, om man har Sikkerhed for, at der ikke bliver brugt mere deroppe end nødvendigt er, saaledes som Tilfældet har været tidligere. Hr. Mortensens Udtalelser undrede mig, men jeg skal ikke komme ind paa dem nu, da Spørgsmaalet ligger klart og det er godtgjort, at Fysikus er uden Skyld.

Edv. Mortensen: Eg má fasthalda, at eftir tí, sum fyriliggur, hevði eg rætt til at framseta spursmál til formannin í nevndini um, hvussu tað var tilgingið við læknalovsinum. Táið sannheitsstýrið hevði mælt til at taka dr. Jónsson — og nationalforeiningin hevði í hvussu er ikki frárátt tað —, sanatorinevndin og Havnar býráð ráddu eisini til at taka hann, so mátti tað tykjast natúrligt, at teir tóku hann altfyri eitt. Her var eingin grund til annað. Og kortini lótu teir hann bíða í o. u. 3 mánaðir. Ein sovorðin atburður má kallast óforsvarligur.

A. Samuelsen: Tað spursmál, eg íáðni rættaði til sanatorii-útvalgið, er komið í bakgrundina. Eg vil tó taka tað uppaftur. Og eg vil takka Konoy fyri, at hann tó royndi at begrunda sín og útvalgsins stilling, og ikki bara henvísti mær til berættningin. Hann anførir sum grund fyri at teir lótu professar Faber fáa hesar upplýsuingar tað, at Faber er specialist í bróstsjúkum og at hann hevur makað við nationalforeiningina at gera. Hetta at hann er specialist í bróstsjúku, havi eg forrestin skrivað mær bak oyra. So sigur Konoy, at hann hevur hoyrt, at nationalforeiningin vildi yvirtaka sanatoriið, men hann veit annars einki um tað; eg havi eisini hoyrt tað og eg kundi tonkt mær tað møguligheit, at professor Faber vildi hava hesar upplýsningar fyri at teir kundu yvirvoya tann spurningin um teir skuldu yvirtaka sanatoriið ella ikki. Konoy sigur, at hann absolut vil ráða frá, at teir yvirtaka tað — og vil ikki taka lívið av tí tankanum. Eg vil spyrja, um Faber hevur biðið um upplýsningarnar fyri at kunna bedøma hetta spursmálið. Um spurningurin hevur verið frammi, so má tað koma til viðgerð her í tinginum. Sanatorienevndin hevur ikki lov at taka lívið av tí tankanum. Debess sigir, at Faber er specialistur í magasjúku, meðan Konoy sigir, at Faber eisini er specialistur í bróstsjúku. Hetta mugu so Konoy og Debess klára teirra millum.

Formaðurin: Grunden til, at Professor Faber kom her, var, at der i Ministeriet kom til at foreligge et Forslag vedrørende Sanatorieforholdene paa Færøerne. Professor Faber vilde ved Selvsyn danne sig et mere anskueligt Billede, end han var i Stand til at gøre nede i Danmark. Naar der maatte blive forelagt Regeringen en Begæring om at dække Underskud ved Sanatoriet, saa syntes man, at det var godt, om Professor Faber, som var Formand i Nationalforeningen, kunde være med. Naar Professor Faber kom herop for at skaffe sig en førstehaands Viden i Tuberkulosesagen, saa er det rimeligt, at Sanatorienævnet giver ham alle Oplysninger, som det er i Stand til.

A. Samuelsen: Hvussu nógv eg kann lesa í referatinum, kann eg ikki úttala meg um. Men eg hoyrdi svarið frá Konoy og eg varð ikki tilfriðs. Nú hevur formaðurin givið upplýsingar. Hevur nevndin fingið hesar upplýsingar, hví gevur hon teir so ikki her í salinum.

S. P. úr Konoy: A. Samuelsen krevur upplýsingar og tá hann hevur fingið teir, so hevur hann ongar fingið. Tað vildi vera at beklaga, um vit noktaðu professor Faber, sum er formaður fyri nationalforeiningina vfor Tuberkulosen í Danmørk, upplýsingar. A. Samuelsen veit, at sanatoriið hjá okkum hevur tvær deildir. Einans eitt sanatorium í Danmark hevur tað sama. Um specialistar diskutera vit ikki. A. Samuelsen er sýslumaður av specialitet.

A. Samuelsen: Tað síðsta orðið er rett. Konoy er góður pedagogur, men ringur specialistur í sanatoriisakini. Tað var Konoy, sum sigir, at tað var sagt, at nationalforeiningin skuldi yvirtaka sanatoriið. Hann vendi sær hvassliga móti tí tankanum, so at eg helt, at hann vildi taka lívið av honum. Um nationalforeiningin drívur okkara sanatorium og tað harvið bloiv betri fyri sjúklingarnar, so vóru vit ringir tingmenn, um vit ikki tóku ímóti tí. Fyri mær er hetta ein viktig søk. Nú havi eg vónir um, at tað fyriliggur nakað gott aftanfyri. Eg eri glaður yvir, at mann hevur fingið teir upplýsingar, sum mann hevur fingið av tí spurningi, sum kom framm.

S. P. úr Konoy: A. Samuelsen sigir, at tað liggur nakað aftanfyri?

A. Samuelsen: Eg vónaði, at tað lá góð hensigt aftanfyri tað, at Faber hevði samlað upplýsingar.

S. P. úr Konoy: Havur A. Samuelsen lvast í at Faber ikki hevði gott í sinni?

M. A. Winther: Eg vil spyrja nevndina um spurningurin um, at Nationalforeningen skuldi taka við sanatoriinum, hevur verið fyri í nevndini. Eg spyrji beinleiðis.

A. Samuelsen: Eg haldi at Konoy nú gerst alt ov durkdrivin. Eg havi ikki hugsað, at ilt lá aftan fyri hjá Faber. Eg segði, at eg vóni, at tað liggur nakað bestemt gott aftanfyri, nemliga, at Nationalforeningen vil gera tilboð um at yvirtaka sanatoriið.

Nyholm Debess: Mær vitandi fyriliggur einki slíkt tilboð frá Faber. Tað framhelt eg fyrr. Men man kann kanska siga, at tað var væl, um tað fyrilá. Men tað kundi eisini verða sagt, at vera eitt máti, at man skulkaði sær frá eini plikt, sum man hevði í eygabliklinum. Tað átti at vera so, at bæði logtingið og t. d. kommunur í Føroyum kundu fingist at lata meiri til sanatoriið. Í Danmark kemur nógv og munagott til slíkt endamál bæði frá statinum og at frívilligum veg. Man skuldi arbeitt fyri, at eisini okkara sanatorium fekk ein stuðul á hendan hátt.

S. P. úr Konoy: A. Samuelsen sigir, at eg havi hoyrt um spurningin sum eitt rykti. Tað hevur verið borið upp á mál fyri mær --- fyrst frá landslæknaum. Eg kann forstanda, at Faber er komin upp til at fyriroika spurningin. Eg havi fingið tað inntrykk at Nationalforeningen annars ikki ætlar at dríva sanatoriið hor. Men spurningurin hevur aldri verið frammi í nevndini. Nationalforeningen er okkum vælsinnað og vil fegin standa okkum bí; tað hevur hon gjørt frá fyrsta degi. Til Effersøe kann og siga, at eg kenni ikki til nakra flottheit. Hansara orð kundu skiljast so at tað varð brúkt ovmikið til sjúklingarnar. Tað lotur seg tó ikki gera at spara ov nógv við kostinum til tørra. Vit mugu ikki geva sjúkum fólki tað inntrykk, at har er ringt at vera.

A. Samuelsen: Debess sigir, at um tingið lot sanatoriið til Nationalforeningen, so var tað at skulka sær frá tí. Um tað varð betri fyri sjúklingarnar, so kunnu vit gera tað. Tað var einki órímiligt. Vit eru øll born av einum ríki. Um vit koma at taka stuðu til hendan spurning, so kostar tað kanska yvirveyilsi. Kanska tað vil sára okkara nationalu stoltheit at gera tað. Men tað vildi í tilfeldi vera ein plikt. Tó, hetta fyriliggur ikki nú.

S. P. úr Konoy: Tá Faber bað um upplýsingar so tonkti eg, at tað kundi vera nakað í tí, at hann vildi forbereiða stillingin, og at Nationalforeningen vildi yvirtaka sanatoriið.

A. Samuelsen: Konoy segði óttrykkiliga, at heruppi hevði verið talað um at nationalforeiningin skal yvirtaka sanatoriið, eg havi eisini hoyrt talan um tað her uppi, og eg hopi, at hann forbereiðir tann spurning. Í hvussu er mugu vit fáa studning úr statskassanum, um vit ikki skulu lata patientarnar líða undir altfor ringum korum.

Th. M. Strøm: Táið Samuelsen sigir, at vit eiga at lata plikt og ansvar yvirfyri sanatoriinum frá okkum, tí vit eru born av statinum, og altso hava krav uppá statskassan, so vil eg bert siga, at eitt er born og annað leysingabarn.

Nyholm Debess: Eg eri glaður yvir, at Andrass Samuelsson heldur, at sjúklingarnir skulu hava tað gott, men tá hann so sigir, at vit skulu hava hjálp hartil antin frá nationalforeiningini ella frá statinum, so gloymir hann at nevna okkum sjálvar, vit eiga kortini at taka tann størsta partin av byrðini.

S. P. úr Konoy: Eg havi einki óttalað á tann hátt, at nationalforeiningin skal yvirtaka sanatoriið, og vóni tað heldur ikki, men eg segði, at tað hevði verið tosað um tað í Føroyum, og eg nevndi mannin, ið segði tað.

A. Samuelsen: Eg havi heldur aldri sagt nakað annað, enn at tað her uppi hevir verið tosað um, at nationalforeiningin skuldi yvirtaka sanatoriið, og um Konoy vil sleppa frá at hava sagt annað, má hann retta í referatinum. Strøm plagar summartíðir at halda stuttar talur, helst tá eg havi verið uppi, og soleiðis eisini nú. Eg skal bara siga, at eg rokni meg sum barn av statinum. Strøm er altso leysingarbarn, tað er jú eisini gott, men tað verður hansara

sak, hvussu hann uppfatar sog. Nyholm Debess spurdi, hví og ikki nevni, at vit kunnu fáa studning frá okkum sjálvum? Eg segði, at vit kundu fáa studning frá statinum, men staturin er jú notupp N. Debess og eg og vit allir, so tá nakað fer úr statskassanum, so fer tað frá N. Debess og mær og okkum øllum.

R. Rasmussen: Eg vil spyrja teir, ið eru í nevndini: hvat er tykkara hugsan um tær 61,000 kr., ið skulu ganga til umbotingar: er tað meiningin, at vit skulu gera alt, ella staturin nakað av tí? Effersøe heldur, at her hevir gingið nakað flott til; og kann einki siggja her um, í tí økonomiska yvirliti, men eftir einum leysligum yvirslagi, eg nú havi gjørt, haldi eg, at einar 1200—1500 kr. eru gingnar pá hvønn sjúkling á hóstsjúkuhúsinum, og um so er, at tað er toliliga beint, so er har eingin flottheit, tí tað er ikki ov nógv, tá ið har er roknað bæði vask og matur og alt annað, og tað vil vera utan rætt, at hr. Effersøe talar um flottheit. Tað kann jú ikki frávíkjast av nøkrum Føroyingi, at tað er sunnast og best, um vit Føroyingar taka driftina sjálvir. Eg trúgvi ikki, at nationalforeiningin yvirtekur sanatoriið uttan at vit biðja hana um tað, og tann bønin fyriliggur ikki enn, og hon eigir ikki at fyriliggja, utan vit ikki *kunnu* sjálvir. Tað fyriliggur einki tilboð frá nationalforeiningini.

Nyholm Debess: At vit vilja fáa extraordineran studning frá statinum til driftina av sanatoriinum eins og onnur sanatoriir í kongarikinum Danmørk, ivist eg ikki í. Men so koma vit til tað A. Samuelsen kallar ikki reparatión, men forbedring og útvikling; útvalgið hevir ikki tikið stilling hartil, tí vit hava hildið, at spurningurin var so stórur, at løgtingið má avgera hann, og tað verður so tann nevnd, ið nú verður vald undir tingsetuni, ið fer at hugsa um tað. Men og meini fyri meg sjálvan, at vit mugu sjálvir taka eitt gott tak. Mær dámar ikki at fara tann veg, sum A. Samuelsen altíð vil, til tann danska statskassan, tí vit bera ikki tær byrður, sum teir har niðri, og hava soleiðis ikki fult tey somu krøv.

Samtykt varð at beina málið í 5-mannanevnd.

Nevnd viðv. logtingslógini og skattalógini.

Edv. Mortensen: Ífjor samtykti logtingið uppskot til eina nýggja logtingslóg og eina skattalóg. Skattalóguppskotið gekk út uppá at fáa logtinginum ein inntoku-skatt á eitt betri grundarlag enn hagartil. Vit hava har byrjað við 1 %, sum so veksur til 4 %. Uppskotið var nógvo detaillerað: har vóru uppsettar reglur fyri berokman av inntoknunum, hvat ið skuldi verða frádrigið, hvønn skattabyrðan skuldi hvíla á o. s. fr. Hetta uppskotið hevur ministeriið ikki vilja lagt fram fyri ríksdagin og skjýtur nú uppá, at tað skal handfarast í eini serligari kommissión. Hvat teir hava ímóti tí, vita vit ikki, um tað er sjálvi princippini í uppskotinum ella aðrar tekniskar atfinningar, sum atvoldin er. Um so skuldi verið, at teir frá danskari síðu eru ímóti, at vit fáa okkum eina slíka inntøkulóg fyri logtingið, vóni eg, at vit fáa sakina framda kortini, tí eftir orðaskiftinum, her er fallið ífjor, tykist eisini sambandsflokkinum at vera fyri hesum máli. Teir úttalaðu jú ífjor, at flokkurin ikki principielt var ímóti eini slíkari lóg, men teir hildu ikki tíðspunktið vera komið enn. Tað var eisini fort fram, at kommunustýrini her hjá okkum ikki fóru at duga at administrera hesa lóg, og at hon ikki var neyðug, tí — hvat skuldu vit bruka pengarnar til! Hetta segði orðføraríu. So vístu teir eisini til amtsrepartitiónsfondsskattin — hann verður altíð vist á —, men tað áttu vit væl allir at verið samsintir um, at tann skatturin er ikki rættferdugur. Táið vit nú t. d. fár skuhu líkna so og so nógv túsund á amtsrepartitiónsfondina, so má tað verða uppá gjørt, hvussu nógv vit líkna uppá hvørja kommunu. Men eitt skjønn kann lætt fara skeivt, nakað heilt annað er, tá vit hava eina skattalóg at halda okkum til, sum sigur so og so nógv procent líkna vit. Tí heldur kann tað eftir núgaldandi beskatningsreglum koma fram, hvussu stórar inntøkur borgararnir hava. Og sjálvtum kommununrnar hava listar yvir inntøkurnar í kommununi, brúka tær ymiskar beskattingsmátar; summar líkna eftir vissum pro centum javnt yvir alt, summar eftir stigandi skala. Av øllum hesum orsokum mugu vit koma til ein annan framgangsmáta enn við amtsrepartitiónsfonds-skattinum, koma inná tey somu principp, sum alla aðrastaðni verða nýtt. Vit mugu burt frá tí skjønsmessigu ætlan til fastar skatta-

reglur og stígandi skala. — Hin atfinningin: at vit ikki hava brúk fyri peningi, trúgvi eg sjálvt minnitalið hevur fingið ein annan hugsan um í seinastuni — vit hava t. d. sanatoriið við øllum sínum útreiðslum liggjandi fyri okkum, — nú fleiri og fleiri krevjingar koma fram til løgtingið ár undan ári. Tað fer tó ikki at bera til at beina alt á statskassan og siga, at vit einki vilja gera sjálvir; vit kunnu tó ikki nokta fyri tí, at ein maður í Føroyum hevur nógvar ferðir minni í skattabyrði til statin enn ein maður í Danmark. Eg vil tí vóna, at honda sak, tá hon kemur í ta kommissiónina, sum niðursett verður av ministerinum, eisini verður væl undirtikin av teim representantunum, sum sambandið setur inn har. Eg veit sum sagt ikki, um tað er principiel ella teknisk spursmál í uppskotinum, teir ynskja at granska; og kundi tonkt mær, at hesi 4 % tykjast teimum ovlítil stigningur; teir har niðri hava jú upp til 6 % í teirra skattalóg. Vit hava viljað byrja so lagaliga, scinni kunnu vit ganga lægri. Sjálvsagt vil eg innrømma tað, at ein slík kommissión, hetur kann vera før fyri at smíða eina lóg enn ein løgtingsnevnd, sum einans situr undir eini tingsetu, men eg vil halda uppá tað, at hetta uppskotið væl kundi brúkst sum skattalóg í Føroyum, í hvussu er til at begynna við. Eg eri tí forharmaður yvir, at ministeriið ikki hevur viljað framt hesa sak; vit hava brúk fyri pengum, og eg vóni, at kommissiónin skjótt kann koma til eitt gott úrslit. — Hin sakin er uppskotið til eina nýggja løgtingslóg. Tað var eisini samtykt ífjor. Nakrar høvuðsreglur í tí vóru hesar, at øll lóguppskot viðvíkjandi Føroyum skuldu fyrileggjast løgtinginum og eingin lóg viðvíkjandi okkara serligu viðurskiftum setast í kraft, áðrenn hon hevði verið fyri á løgtingi; at sakir, sum sendar verða til ríkisstýrið og ikki framdar eftir tingsins vilja, skulu sendast aftur til tingið við øllum teim upplýsingum, sum fram eru komnir síðani. Annans skal eg vísa til tað, ið framført bleiv ífjor frá okkara síðu viðvíkjandi hesi broytan av okkara statsrættsligu skipan. Eg eri forharmaður um, at ministeriið ikki hevur vilja framt hesa lóg, tí vit treingja harðliga til hana; tað sæst best á, tá vit hyggja at øllum teim søkum, vit ífjor sendu til Danmarkar, og sum nú aftur liggja her á tingbordinum órørdar. Taka vit uppskotið um løgtingstíðindi, vit hoyra einki frá tí. Ella um hvalaveiðu ella pieranlegg í Vági — hoyra vit einki aftur. Stórur partur av teimum viðtøkum, sum tingið samtykti ífjor, eru ikki settar í kraft. Vit halda, og fólk út um landið vil halda tað sama, at gongur tað á hendan hátt, so mugu vit sjálvir taka ráðið. Kravið um, at tingið sjálvt innanfyri eitt vist mark má hava myndigheit, má vaksa, tá vit siggja, at tað mesta av tí, sum tingið samtykkir, verður ikki sett í kraft. Ikki eingang lógin um bókføring er framd. Og lógin um arva-avgift — heldur einki hoyrt aftur um hana. Og lóguppskotið um, at okkara mál skal verða skúlamál; eisini ta sakina fáa vit aftur skongda. Málið um at faa íslendskar læknar — eisini aftursent. Og tað sama gongur við skattalógini og tinglógini. — Ministeriið nevnir einki um, hvat tað hevur ímóti uppskotinum til løgtingslóg, so tað batar lítið at orðaskiftast um, hví teir eru ímóti tí. Kanska meina teir, at slíkt er í stríð við grundlógina. Men eg og fleiri meina ikki, at hettar uppskotið er í stríð við grundlógina. Hvør vil nu siga annað enn, at tað var rímiligt, at tingið hevði rætt til at fáa, og regeringin plikt til at senda okkum svar aftur uppá sakir, sum vit samtykja. Og vit mugu fáa at vita, hvat amtmaðurin og fysikus og sunnheitsstýrið hevur sagt, táið sakirnar hava verið hjá teimum og ikki kunnu framjast. Tílíkar sakir kunnu ikki verða avgjørdar, utan at tingið fær at vita, hví tað er. Um tað vóru onkur smáting, sum tekniskir spurningar ella tílíkt, so var tað nakað annað. Er tað so, at uppskotið um løgtingslógina skuldi vera í stríð við grundlógina, ja, so mugu vit royna at broyta grundlógina. Og her fyriliggur júst brævi frá studentunum um grundlógarbroyting, og tíðspunktið til tess má so nú vera fyri hond. Tað gongur út á at fáa lyftiparagraff í grundlógina, so at tingið kann fáa ræði í serstøktum føroyskum viðurskiftum um tað ynskist. Tá vit siggja, hvussu tað hevur gingið, so er rímiligt, at vit vilja halda eitt portur opið fyri okkum og okkara eftirkomarum. Vit mugu fáa broyting í grundlógina. Fleirtalið vil, at uppskotið um løgtingslógina fer í ta kommissión, sum ministarin skjýtur uppá. Tá ein ikki hevur tingið sett lóguppskotið ígjøgnum, so kanska vit koma fram við sterkari krøvum enn hetta løgtingslóg uppskotið. Hvussu mangir menn skulu sita í hesi nevnd, hevur ministarin ikki úttalað seg um. Okkara ætlan er, at kommissiónin eigur at sita í Føroyum. Eg mæli til,

at øll hesi spursmál fara í eina 5-mannanevnd.

A. Samuelsen: Uppskotini um nýggja skattalóg og tinglóg hava vit drøftað á tinginum ífjør. Fyri sambandsmenn kann og siga, at tá vit fáa ein so stóran reform at yvirveja, um vit tá ikki kunna gera hetta uppskotið betri enn ífjør. Vit vita, at tað við skattalógini er ætlað at leggja størri byrðar á fólk, á kommununar, og vit sambandsmenn hildu tí at tað var rætt at lata tær síggja tær reglur, sum verða fyrislignar fyri at vita, um hesar reglur kunnu hóska hjá okkum. Orðførarin fyri fleirtalinum sigir, at minnitalið fyrr hevur hildið at vit hava nóg mikið av peningi. Eg skal siga, at tað tykist sum tað fleirtalið, ið nú er, hevur gott hegni til at geva pengar út úr løgtingskassanum. Men tá mugu pengar koma inn aftur. Fleirtalið hevur ikki eina givið nógvar peningar út men teir hava eisini pádrigið okkum stór forpliktilsir. Vit vilja framm við sparsemi. Er tað so at fólk hevur haft nógvan pening millum hendur í hesi tíð, so eru eisini byrðurnar vaksnar. Viðvíkjandi løgtingslógini, tá høvdu vit sambandsmenn ífjør okkara egna uppskot um, hvussu vit hildu eigir at gerast. Um fleirtalið hevði slutta seg hartil, so hevði uppskotið verið samtykt har niðri. Frá ministeriinum fyriliggja úttalilsir, sum vísa, at man einki serligt hevur ímóti, at amtmaður og próstur ganga út av løgtinginum. Kanska eisini høvdu vit fingið hinar broytingarnar ígjøgnum. Fleirtalið valdi at koma við einum størri uppskoti, sum ikki kundi gjøgnumforast niðri. Teir lótu munnin nakað nógv upp og so fingu vit einki gjøgnumført. Tað eru sjálvstýrismenn, ið hava latið munnin ov høgt upp; sambandsmenn kunnu ikki ganga við til hetta, ríkisdagurin heldur ikki; tó man tað vera best at halda ríkisdagin uttanfyri hetta, tí hann hevir enn ikki haft leiligheit til at taka stilling til spursmálið. Ministeriið hevir sent uppskotini aftur, og tað sigir í tveimum fylgibrøvum, at tey eru ikki skikkaði til at verða lóg, sum tey eru. Tað hevði verið gott at fingið at vita, hvat tað er ið gor, at tey ikki eru skikkað hartil, serliga hevði tað verið gott, um ministeriið vildi sagt, hvat ið brekaði løgtingslógini, so vit høvdu nakað at rætta okkum eftir. Nú fáa vit bert at vita, at uppskotini kunnu ikki brúkast, men ikki hví. Orðførarin fyri fleirtalinum heldur fyri, at við tað at einki er komið burtur úr hesum søkum, so mugu vit fyritaka okkum nakað, vit mugu royna at broyta okkara statsrættliga stilling, ella sum ein annar talari av fleirtalinum segði, at vit mugu í hesum hava tað seinasta orð. Eg haldi ikki tað er neyðugt, men eg haldi, at tað er ein plikt fyri løgtingið at undirsøkja um tey uppskot, vit seta fram ikki kunnu gjøgnumførast uttan grundlógarbroyting, tað má vera tað fyrsta, vit eiga at gera. Nú sigir orðførarin fyri fleirtalinum, at hann kann ikki síggja, at nøkur paragrafi í uppskotinum er í stríð við grundlógina, men so halda aðrir menn tað, og t. d. halda teir tað í ministeriinum. Tað tykir mær, at tað var ikki bert henda sak, ið er illa úr hondum greidd, men fleiri aðrar, og tí hava vit fingið tær aftur. Har var t. d. lógin um skúlamálið, sum var illa upplýst, og nú hevir ministeriið sent okkum hana aftur og biðið um tær upplýsingar, og tí verður hon forsinkað eitt ár. Tað er ikki at ivast í, at í mongum lutum hava vit okkum sjálvar at takka fyri, at vit hava fingið so mangar sakir aftur, tí tær hava ikki verið ordiliga upplýstar. Tað er nú, síðani at vit hava fingið hetta nýggja fleirtalið, ið sigast at skula vera so væl í ætt við ministeriið, at vit fáa so nógvar sakir aftur, tí eg minnist einki til, at vit, tá vit vóru í fleirtali og høvdu okkara ministerium, fingu sakirnar aftur soleiðis, vit arbeiddu væl saman, men her vísir tað seg, at samarbeiðið millum fleirtalið og ministeriið er ikki tað besta. Hetta er ein sak, ið má ordnast millum fleirtalið og ministeriið, forfatningin eigir ikki at angripast av tí. Eg forstandi ikki, at tað skal vera nødvendigt fyri ministeriið at fyrisláa eina kommissión hertil. So sum eg siggi uppá sakina, haldi eg, at ministeriið skal taka uppskotið hjá sambandsmonnum og frenja tað; tað kann ministeriið siga er gott, tí tað hevir tað hildið fyrr. Eisini kundi ministeriið sagt: alt tað, ið smakkar av tendens til at broyta Føroya statsrættligu støðu, og geva teimum sjálvræði, mugu vit ganga ímóti, tað kundi eg forstaðið, men ikki hesa kommissiónina, tí hon vil ikki skapa nevniverdiga klárheit, men heldur flokja sakina. Og eg má siga, at tá er man komin vítt, tá ið man fer at seta kommissiónir fyri at fáa skil á forholdinum millum landspartar. Tað vísti seg við Íslandi; so skjótt tað kom til tað, at teir settu kommissiónir til at bøta um forholdini, tá var skilnaðurin ikki langt burtur. Um tað er meiningin, at okkara støða skal vera sum Íslands, ella vit ikki skulu ganga so vítt enn, veit

eg ikki, men beginna vit fyrst uppá tað, enda vit á sama máta sum Ísland. So leingi ministeriið tekur tann stilling, tað tekur her, kann tað parti, eg hoyri til, ikki ganga við til at niðurseta eina kommissión í hesum máli, vit kunnu ikki ganga inn í eina sovorðna kommissión og ikki acceptera hana. Tað verður ein sak millum regeringina og sjálvstýrispartiið. Tað fyriliggur einki krav um eina sovorðna kommissión frá Føroya fólki; hesi problemir eru skapaði av sjálvstýrispartiinum, sterkt uppstrammaði av regeringini. Vit vilja vera við til at drefta okkara uppskot, men ikki hitt. — Um tað verður sligið fast, at okkara statsrættligi stillingur *skal* broytast, um vit skulu missa okkara priviligeraða stilling, um vit skulu fara sama veg sum Íslendingar, so má ein kommissión setast til at yvirveya tað, og tá kunnu vit fara inn í. Men hesa situatión hava vit ikki skapað, hana má sjálvstýrið um. Annars haldi eg, at í brævinum frá ministerinum stendur so ógviliga lítið; har er einki nevnt um, hvussu mangir limir skulu vera, hvussu mangir skulu vera Føroyingar, hvussu mangar løgtingið skal velja og hvussu mangar regeringin. Annars hevir tað verið siður, at táið kommissiónir verða settar, at tað verður skilað til hvussu mangir menn skulu vera í teimum, og av hvørjum teir skulu voljast, men herum stendur ikki eitt orð. Man fær tað inntrykk, at her hevir ministeriið skundað sær av nógv. Teir hava ikki vita hvat teir skuldu gera fyri at formilda sjálvstýrisveljararnar í Føroyum, og so hava teir funnið uppá hesa kommissión, uttan at geva sær stundir at útarbeiða forslagið heilt. Eg taki uppaftur hvat eg segði: Vit vilja ikki hava eina slíka kommissión og vit vilja ikki arbeiða í einum slíkum útvalgi. Annars skal eg styðja uppskotinum um at hetta verður víst til eina 5-mannanevnd.

R. Rasmussen: Tó at ein maður hevir talað sjálvstýrisflokksins vegna, skal eg loyva mær at taka orðið fyri at siga nakað sum eg sjálvur kenni hug til at siga, uno enn og ikki havi allar mínar partamenn við mær. Hetta er eitt mál, ið hevir verið ofta á tingi fyrr, og tað kann ikki tykjast nøkrum manni undarligt, um vit nýta langa tíð til at skifta orð um hetta, tí tað er ein stórpolitiskur spurningur, og tingmenn fáa her óivað loyvi til at sveima inn á aðrar spurningar, ið nerta við hetta fyriliggjandi mál. Tað hevir ofta verið so, at serliga minnitalið her hevir grant seg um, at fleirtalið bæði fyrr og nú blakar stórpolitiskar spurningur inn á ting, og harvið spillir tingsins tíð. Hetta er ikki beint sæð av minnitalinum. Sjálvstýrismenn eru aldeilis ikki sinnaðir til tess at blaka slíkar spurningar inn á ting fyri at fáa nakað at berjast við og klandrast um. Tað hugsi eg, at sambandstingmenn nú fara at fáa eygu upp fyri, at aftanfyri hetta liggur eitt fólkakrav, ið er vaxandi og er skjótt vaxandi. Tað er einki órímiligt fólkakrav, tí sjálvstýrisflokkurin er vaxin undir tí, og tað vil eina ferð koma tann tíð, tá alt Føroya fólk stendur samsint aftanfyri hesum kravi. Grundirnar fyri allum hesum, sum frá sambandsins síðu er sagt at vera órímilig krav — og teir mugu ifylgju teirra støðu siga so — men sum vit sjálvstýrisfólk kalla heilt natúrligar krevjingar, eru ymiskar. Tá Føroyingar fingu grundlógina vóru teir eitt politiskt sovandi fólk, nú eru teir vaknaðir við ella eru við at vakna, og krevjingarnir koma nú fram íkraft av tí politiska frælsi, vit fingu gjøgnum grundlógina. Nú eru Føroyingar vorðnir ótilfriðsir, nú stilla teir krav, sum mótstøðumennirnir kalla órímilig. Og hesi krav økjast, tey vaksa í heilum. Hetta kann tykjast órímiligt, eisini fyri Danir. Teir hava ongatíð skilt okkum og teir skilja okkum ikki enn. Teir standa meir og minni forstandi yvirfyri teim sterkastu rørslum, sum nú eru í Føroyum — um ikki allir, so nógvir. Og tað er óivað heldur ikki nøkur løtt sak at fata tær upprunaligu rørslurnar hjá einum øðrum fólki. Teir óttast fyri skilnaði, tí teir vilja loggja hand á eitt umráði, har ikki hand eigur at vera. So seta teir eina kommissión til at granska okkara politisku forhold — av tí púra neyð, tí sjálvir fata teir tey ikki. Vit fáa nú at síggja, um teir verða klókari av hesi kommissión og hennara granskan; Føroyingar luvur tað ikki gjørt mildari, teir hava einki uppnátt til tess at javna út. Teir veita pening til okkara til ymisk formál, og tað er oll partíir einug um, men tað ger okkum heldur ikki tilfriðs, merkiligt nokk. Vit vilja hava nakað annað, tað sum hvørt politiskt vakið fólk vil hava: *ræði heima hjá sær sjálvum*. Tað kann kanska koma óklart fram frá einum fólki sum okkum, ið ikki er fullment, men eingin skal tí trúgva, at tað ongan botn eigur. At sambandsmenn eru tilfriðs, hvat vil tað í grundini siga? Já, tað er akkurat tað sama sum tá ein gamal maður er tilfriðs við forholdini. Hjá honum er einki nýtt

at vanta av lívinum, hann kennir ongan tráan í sær, ongan framfarahug. Tað kann gott vera ein lívsklókur maður; hann er tilfriðs, men — framtíðina eigur hann ikki. Við síðuna av honum eru ommur ungmenni, sum ikki eru tilfriðs. Tey eiga framtíðina. Illa hevði verið vorðið hjá tí gamla mannin-um, um oll høvdu verið tilfriðs, tá hann var barn, og hjá teim ungu, um standurin bleiv verðandi sum hin gamli maðurin var tilfriðs við. Tann idé, sum ber sambandlið uppi, er avdeyði. Tann idé, sum ber sjálvstýrið fram, eigur sínar fríska røtur í lívinum, og tað var líka ilt, um hon varð køvd hjá Føroyingum, sum tað er tá barnið verður tyktað so, at tað einki torir. Tað kann ikki sigast annað, enn at tað hevur verið frítt orðaskifti og frítt stríð millum samband og sjálvstýri í Føroyum. Vit hava komið fram við okkara krøvum ferð eftir ferð, og so blíva vit við. Vit settu fram Ólavsøkubrævið lítt tiltikna; tað náddi ongan veg fram, tí tá vóru vit í minnitali. Og okkara krav sýnast ikki at minka. Tað er skiligt at ríkisstýrið roynir at finna útvegir fyri at ímøtakoma okkara kravum, um tað enn hevur ilt við at skilja tey; sum teir mentaðu menn teir eru, duga teir at anerkenna sjálvt tað, sum teir ikki fata tilfullnar. Vegna tess, at kravini ikki eru skild til fullnar falla ímøtukomilsini heldur illa út uppímillum. At lóguppskotini verða send aftur á okkum, skulu vit ikki uppfatu sum órímiligheit frá teirra síðu, men heldur sum tað, at teir ikki eru klárir yvir, hvørjar fylgir tey kunnu draga eftir sær, og tí ikki tora taka støðu. Her liggja nú 9 tílík mál. At løgtingslógin var aftursend, kundi ein kannska ventað, skattalógina harímóti høvdu vit ikki vantað aftursenda, jarðamóðurlógina fati eg ikki, hví hon er aftursend, her má nakað galið verða, og lóg um bokføring? Vit eru bidnir um at smíða ta donsku lógina um eftir okkara viðurskiftum, tað gera vit í samráð við keypmannsfeleginini, og 20 løgtingsmenn samtykkja hana. Hon verður aftursend kortini. Lóg um arvaavgift líkaleiðis eins og stórhvalaavgiftin, sum eingin var ivrigari fyri enn Andrass Sámalsson, já sjálvt nakað so smávegis sum lýsingartíðindi er afturkomið. Studningurin til arbeiðsleysar fiskarar vil og ikki snakka um, men skúlamálið, — eisini tað fingu vit aftur. Hetta er altsaman skapt til at oggja okkum til ótilfriðsheit, á somu tíð, sum teir nettupp hava stúrt fyri at taka støðu til hesi spursmál, tí teir helst vildu gjørt alt eins, so Føroyar í ollum kundu líkst Danmark. Tað er ein vanlukka, her er gjørd av Føroyingum, sum hava haft til høvuðsuppgávu at billa Danum inn, at Føroyar eru Danmark og Føroyingar Danir. Hetta hava sambandsoddarnir altíð gjørt til alla tíðir — her taki eg sambandið í víðari týdning enn tann núverandi politiski flokkurin. Teir kunnu hava verið nóg so dugnaligir menn til praktisk arbeið, tá tað galt pappír og kantór, men andliga vóru og eru teir blindir. Hetta hevur gjørt tað, at Danir eru komnir at trúgva, at Føroyingar vóru tilfriðs við at vera Danir og einki annað ynsktu. Tað er ein ólukka, her er gjørd, einki minni enn ein ólukka. Og tí standa vit nú sum vit standa.

Okkara krav um eina broytan í tí statsrættsligu støðuni er gamalt og tað sýnist sum ríkisstýrið her vil vísa ímótikominheit við at niðursetа eina kommissión. Vit hava haft líknandi kommissiónir fyrr, men heldur ikki tað sýnist at vera okkum nógmikið. Vit høvdu kommissión um sjóneringslógina, men her reisist krav aftur í fólkinum og tað er ikki órímiligt, tí tað er vaksið fast við føroysk viðurskifti. Heldur ikki tann vegurin ber beinleiðis fram. Fyrr hava vit verið nærvið at trúgva, at vit kundu fáa oll okkara krav uppfylt innanfyri tey mark, sum sett eru í grunnlógini, vit hava verið so naivir at trúgva, at andi grunnlógarinnar var ein slíkur, at vit kundu fáa fulla nyttu av okkara valrætti. Øll sum bert vita nakað um samfundsstýrilsi, vita, at valrættur er umsonst, tá tingskilið ikki er so at fólkið fær sett ígjøgnum tað valrættarin skuldi vera midlið til. Tað hevur víst seg, at tað kunna vit ikki. Eitt kunnu vit slóa fast, og tað er samtykt av ollum, at okkara rætta representatión, tað er tað løgting, sum her situr. Her velja vit okkara menn. Ganska víst velja vit eisini ein mann til fólkatingið, men hann verður valdur undir heilt øðvísi forholdum og forútsetningum enn ein fólkatingsmaður niðri í Danmark. Fyri eygablikkið situr hann sum úttrykk fyri minnitali í løgtinginum. Hann er ikki tann rætti representantur fyri Føroyar. Løgtingið er tann rætti representantur fyri Føroyar, men tað kann tó ikki gjøgnumføra nakað. Tí fleirtalið á løgtingi er ikki í yvirensstemmilsi við regeringina. Tað er tívorri so, at bókstavurin í grundlógini slær andan í henni ihel fyri Føroya viðkomandi. Vit hava ikki tað frælsi sum grundlógin tilsigir okkum at hava. So er einki annað enn at

fáa grundlógina broytta, so hon verður okkum og Danmark til gagn. Allir tykjast, at tað er rætt, at løgtingið skal hava lóggávuvald, teorotisk sæð — eisini sambandsmenn. Men tá tað kemur til tað praktiska, so er tað, at sjálvstyrismenn og sambandsmenn skiljast. Tað er her hin ungi, sum setur sína trúgv um framtíðina móti tí klóka gamla manninum. Og hin ungi vil vinna til endan í hesum, sum í øllum. Tað vil kom at sýnast, at tað letur seg praktiskt gera at lata løgtingið fáa lóggávuvald. Men tað er ikki nokk, at tingið fær lóggávuvald. Tað nyttar ikki, tá ikki fleirtalið í tinginum er í yvireinsstemmilsi við ts hægstu administratión. Og tað kunnu vit aldrinn soleingi sum ministarin situr óavhengigur av fleirtalinum í løgtinginum. Tað kann fyrst vera tá ministarin situr uppá fleirtalið í tinginum, sum er hin rætta representatiónin og stendur og fellur við tí. Tað er gott, um vit fáa lóggávuvald í tinginum, men tað nyttar einki, um vit ikki til sonn tíð hava ein ministara sitandi her, sum stendur til svars fyri løgtinginum, sum ministarin í Danmark fyri ríksdoginum, tað hatar ikki at gera nakað hálvt, men at gera tað heilt. Eg vil úttala tað sum ein konsekvens av lóggávuvald fyri løgtingið, at tað er neyðugt, at vit hava ein ministara fyri Føroyum, sum situr í Føroyum og stendur tinginum til svars. Her er einki at krúpa undan nú. A. Samuelsen talaði um, at sambandsmonn ikki kundi vera við at niðursetа kommissiónina, tá tað galt um tílík punktir sum at broyta okkara statsrætsligu støðu. Og so sigur hann tað, at sambandið leggur ansvarið frá sær, um tílíkt hendir. Tað framgekk tó av hansara orðum, at sambandið vil vera við at skava sær rúm í tí nýggja bølinum, altso trýr sambandið uppá framtíðina, *sjálvstýrisframtíðina*. Men teir siga tað ikki. Tað er eitt hár vit hava at ugga okkum við at sambandið vil royna at fáa tað best møgiliga burtur úr tí, um tað gongur so sum vit ynskja. Tað er lugnaligt. Nú havi eg so greitt sum gerast kann, í fáum orðum framsett mítt program fyri sjálvstýri í Føroyum, og eg eri vissur í, at tað sum kann eita rætt *sjálvstýri* í Føroyum, fylgir mær.

A. Samuelsen: Andin í tí, sum R. Rasmussen talaði nú er nærskyld við tað, sum stendur í ólavsøkubrævinum. R. Rasmussen sigir, at sjálvstýrið er vaksið. Tað kann vera bæði rætt og ikki. Men sjálvstýrið her í salinum er ikki skapt av hesum kravunum, sum nú eru frammi frá sjálvstýrismonnum. Tá vit hava hildið fram, hvat sjálvstýrismonninir hava sagt, so hava teir altíð noktað fyri tí, tá teir hava stigið framm á veljarafundum, fyri veljardómstólinum. Teir sita - tí her sum fleirtal. Men um teir nú kunnu fáa eitt fleirtal av Føroya fólki og halda seg uppi, tað veit eg ikki. Sjálvstýrið hevur ikki vunnið uppá tað program, sum tað hevur nú. Men teir fornekta sítt program og fáa ministarin at trúgva sær. Tá eg framhelt programmið hjá sjálvstýrismonnum, so segði justitsministarin ífjør í fólkatinginum, at tað passaði ikki. Eg segði tá, at eg kundi forstanda, hvør hansara hjemmelsmaður var. Mann hevur í Danmark dult fyri at mann hevur viljað meiri enn sambandið. R. Rasmussen segði, at tá vit fingu grundlógina í 1849, tá skiltu Danir okkum ikki og ikki í 1915, og heldur ikki nú. Hann sigir, at í 1849 svóvu Føroyingar, men hann nevndi ikki, at teir svóvu í 1915. Tá vit fingu grundlógina í 1915, tá stemmaði sjálvstýris fólkatingsmaðurin fyri lógini, utan at siga, at í Føroyum vóru onnur krøv. R. Rasmussen valdi sjálvur hendan mannin. Tað er gott í Danmark at forstanda okkum sambandsmenn. Tá fólkatingsmaðurin í 1915 stemmaði fyri grundlógini, so kundu Danir ikki forstonda, at vit vildu broyta nakað í grundlógini. Sjálvstýrið valdi ein mann at stemma fyri grundlógini. Um teir svóvu tá ella ikki, veit eg ikki. Teir vóru á valgi, tað veit eg, men teir gingu kanske í svovni. At Danir ikki kunnu forstanda okkum, tá vit vilja broyta okkara statsrættliga støðu, er ikki teirra skyld, men sjálvstýrismanna skyld. R. Rasmussen segði, at Danum óttast fyri skilnaði; tað kann vera, at teimum óttast, eg veit, at ein stórur partur av teimum er forharmaður yvir hetta stríðið; men hvørjum, ið óttast, tað er Føroyingum, tí um sjálvstýrismenn ikki høvdu krógvað teirra sonnu meining, men hildið hana so klárt framm sum nú, so vildu teir flestu sjálvstýristingmenn verið fallnir við valgið. Okkum Føroyingum er grund til at óttast, tí um hetta kemur í lag, vil sambandið við Danmark upploysast eftir at hava verið í mong 100 ár. Tað er góð grund til at vera forharmaður yvir hetta, tí vit eru komnir til at halda av Danmark igjøgnum hesa tíðina og nógv bond binda okkum saman. R. Rasmusson segði, at Danir forstóðu okkum ikki, og at teir so royndu at bøta um hetta við at seta

kommissiónir, ið ikki altíð var torvur á. R. Rasmussen siktaði væl til ta parlamentariskn kommissión, ið var sett av landstinginum, men hon var niðursett í ein serligan anledning, fyri at klára forholdið millum justitsministaran og ein Føroying, ið bert var Føroyingur eina korta tíð, men ein góður Føroyingur; tað er beklagiligt, at man má seta kommissiónir til sovorðið, men tað kunnu vit jú ikki gera við. R. Rasmussen sigir, at nú vilja Danskaramir fyri at ugga okkum, geva okkum nógvar pengar; ja, tað vilja teir, og R. Rasmussen er ikki tilfreds við tí. Eg gangi út frá, at R. Rasmussen er ein opin og erligur politikari, og eg spyrji hann, hvussu hann vil vera bekeutur at blíva við at taka ímóti hesum pengum, ið hann meinar, at danskir menn lata okkum fáa í blindum, tí teir misfata okkum. Tað er eingin skomm fyri sambandsmenn at taka ímóti teimum, tí vit uppfata hetta á ein annan máta, men tað er skomm fyri sjálvstýrismenn. Eg hava ofta verið noyddur til at halda fram fyri sjálvstýrismonnum, at tað ikki sonir seg fyri teir at taka ímóti pengum frá Danmark, tá teir so skjótt ætla at fáa sær lóggávuvald og síðani sparka til Danmark. Lat okkum siga hetta klárt, so Danskaramir ikki misfata okkum. R. Rasmussen sigir, at sambandspartíið er tilfreds við stillingin, ja, tað er tilfreds við okkara statsrættiliga stilling; harav fylgir ikki, at vit altíð eru tilfredsir við hvussu verður regjort í kongaríkinum Danmark, og eg havi mína meining um tað. R. Rasmussen sigir, at tað er ein gamaldags stilling vit hava í sambandspartíinum, tað unga fólkið er ikki við okkum, tað vil framm. Ja, tað kann R. Rasmussen siga sum hann vil; vit sum rokna okkum at vera danskir statsborgarar, vit taka lut í tí framstigi. Danmark ger, og tað er nnn í øllum londum einigur um, er eitt gott framstig. R. Rasmussen hevir ongan rætt til at siga, at tann stillingur, Danmark inntekur, er ein gamalmannsstillingur, vit inntaka sama stilling sum Danskarar, og vit eru serliga begunstigaðir Danskarar. R. Rasmussen rósar sjálvstýrismonnum og tosar um teir og framtíðina; eg skal ikki vera profet, men hann kann ikki ganga eftir tí framstigi, ið higar til hevir verið fyri sjálvstýrinum, tí til henda dag hava teir haft teirra program krógvað í posa, í tvinnum posum, væl innballað, og fyrst nú, tað er komið úr posanum, kann hann fáa at síggja, hvussu mangir vilja taka við tí, men eg trúgvi, at tað kanska fer aftur í posan áðrnm valgið kemur, tí tað er ein tendens til tað í hansara partii, tóat eg skal gera nógt til, at tað ikki verður innhallað, og og vil biðja menn svrgja fyri, at tað ikki verður innballað niðri í Danmark. Nú vil R. Rasmussen siga: væl hava vit haft programmið í posanum, men á Ólavsoku 1915 tóku vit tað eitt sindur upp úr honum. Ja, R. Rasmussen royndi tá at halda tað klárt fram, men hinir burtforkláraðu tað vesantliga, og netupp ólavsokubraavið 1915 er eitt bevís uppá hvussu sjálvstýrismenn hava roynt at fjala teirra rætta program. Ein av sjálvstýrismonnunum hevir sagt, at teir skuhi berjast fyri at blíva fleirtal í tinginum netupp fyri at bevísa, at teir ikki vilja tann skilnað, sambandsmenn vilja leggja teir undir, men bæði R. Rasmussen og Edw. Mortensen hava í dag sagt frá teirra virkuligu ætlan. R. Rasmussen var so inni á at fortelja frá hvussu tað hevir gingið fyri seg við ymsum sokum, lýsingartíðindi og arbeiðsleysir fiskarar; tað seinna hava vit tosað útførliga um ein annan dag, og lýsingartíðindi, ja, tað var kanska brúk fyri tí undir krígnum, men nú verður tað vvirðiligt; og sigi fyri meg, at ministeriið gott kann behalda lýsingartíðindi, tí vit hava jú einki at seta í tað. So segði R. Rasmussen nakað ið kundi misfatast. Hann segði, at tað vóru nakrir Føroyingar, ið hava viljað billað Danum inn, at Føroyingar eru Danir. Um tað er nakar Føroyingur, ið vil billa Danum inn, at vit eru danskir statsborgarar, so er tað ikki annað enn rætt. Viss hann við hesum vil siga, at vit hava fortalt Danum, at Føroyingar eru danskir statsborgarar, so er tað rætt. Ólukkuligvís er Rasmus Rasmussen eisini har uppi í, tó hann ikki hóskar har. Men viss hann meinar, at Føroyingar hava billað Danskarunum inn, nú vit eru akkurat sum aðrir Danskarar, so vil eg siga meg ósekan. Eg havi ikki billað nokrum tað inn, og eg forstandi ikki, hvønn hann siktar til. Eg vil biðja hann nevna, hvør ið hevur sagt, at Føroyingar eru Danir og siga, hvar tað er skeft. Hann hevur ikki lov at kasta slíkt út utan bevís. Rasm. Rasmussen lat forstanda, at tað vóru sambandsmenn og segði, at teir nokk kundu vera dygtigir, men teir vóru andliga blindir. Hetta er eitt harður dómur, men tíbetur er maðurin ikki kompetentur at avsiga leandu dóm tí nú hann er andliga dapurskyggur, er almannaliga bekennt. Rasm. Rasmussen havi eg ongatíð ansað fyri at vera meira enn meðalhegáva-

ðan, og tað vísir seg, tá hann innletur seg uppá at fella ein dóm, sum hann ikki hevur minstu kompetensu til. Eg má siga kortini, at hann hevur skuffað meg, sjálvt um eg ongatíð havi haft hógar tankar um hansara vit. So sigur R. Rasmussen, at her hava verið framsett muntlig krav um at fáa ein mann millum okkum og regeringina. Eg vil gjarna vita, hvat hann her siktar til. Eg kenni einki til sovorðin krav, og og forstandi ikki, at sjálvstýrismenn, hvarav tó einkultir duga at skriva, framseta muntlig krav. Ganska vist havi og hoyrt um eitt og annað, sum skal hava verið muntliga framsett, og sum kanska ætlan var at senda niður, men eg havi ikki funnið anleiðing til at bera tey fram níðri. Hann tosaði so um forskellig krav, Føroyingar skuldu hava reist. Sjóneringslógina vil og ikki koma inn uppá; har kunnu vit væl vera einigir um, at viss hon er komin í ringt lag, so er høvuðsskyldin hjá Rasm. Rasmussen, tí hann hevur jú verið saman við kommissiónini um hetta málið. Tann umbroytan, har fann stað er emtá tiltreðað av landstingsmannunum, sum emtá talaði fyri sakini í landstinginum. Og hann er jú formaður í sjálvstýrispartínum, so tað mugu teir ordna sína millum alla við skiparaforeiningina. Ansvarið er teirra. Síðani tosar Rasm. Rasmusson um at kravið um at broyta okkara statsrættliga stilling í sjálvstýrisrættning ferð eftir ferð hevur verið framhildið av sjálvstýrismonnum. Tað hevði verið gott, um sjálvstýrismenn hevdu kraft valg bara uppá hesar spurningarnar og forplikta seg til ikki at draga aðrar spurningar inn í. Fáa teir fleirtal uppá tað, ja, so mugu vit erkenna, at fólkafjøldin er við sjálvstýrinum. Hegartil hava teir ongatíð haft fleirtalið av veljarunum við sær. — Væl er logtingið okkara rætta representatión, men ríksdagurin er eisini okkara lógliga og rætta representatión. Og tað er gott tað sama. Enntá sjálvstýrismenn hava níðri á ríksdegi vnskt at broyta lógforslog, sum logtingið hevði viðtikið — tað vísir gjølla, at teir hava hildið ríksdagin vera okkara rættu representatión. — Tað er ein nýggjur upplýsningur, at sjálvstýrispartíið og regeringin ikki eru í yvireinsstemmilsi, hvørt við annað. Fyrr hava vit jú hoyrt, at teir vóru mestsum eitt, at teir foldu seg í bosta yvireinsstemmilsi við justitsministaran — og hava teir ikki gjørt tað, so hava teir fort nannin buk Ijósið. Tað treingir til eina nærmari forkláring tá Rasm. Rasmussen nú sigur, at teir ikki eru í yvireinsstemmilsi við justitsministaran. So sigur hann, at grundlógbókstavirnir sláa grundlógarandar ihel. Tað veit og einki um, tað er ein pástandur, sum hann vanskuligt kann halda fast uppá. — Rasm. Rasmussen sigur nú, at hann ikki aleina vil hava lóggávuvald fyri logtingið, men eisini ein ministara, sum stendur logtinginum til svars, og sum stendur og fellur við logtinginum. Eg takki Rasm. Rasmussen fyri, at hann hevur sagt hetta klárt og greitt; viss teir stadiga vilja halda hetta fram, so kann fólk taka stilling til tað, men so forlanga vit eisini, at teir taka allar konsekvensir við, eisini viðvíkjandi okkara finansiella stilling. Tað ber ikki til at siga sum fyrr hevur verið sagt, at vit skulu hava felagsskap álíkavæl; Danmark kann nokk fáa lov til at lata alt til okkara, men vit skulu ráða. Hatta má forandrast; teir mugu siga: Vit bera allar byrðar, sum fylgja av tí, at logtingið fær lóggávuvald og vit okkara egna ministara, kanska sitandi úti á Frelsinum, sum stendur logtinginum til svars og stendur og fellur við tí. Lat okkum fáa valg uppá hatta kravið uttan unakra emballagi! — Rasm. Rasmussen vil misskilja míni orð tá eg sagði, at tá tað var avgjørt, at Føroyar skuldu hava ein annan statsrættsligan stilling, so vildu vit sambandsmenn taka hetta undir yvirveyilsi. Tað er ein sjálvfylgja; viss vit ikki verða útvístir úr Føroyum, tá sjálvstýrið er komið, so eru vit væl noyddir at samráðast um, hvussu viðurskiftini skulu verða. Uttan so, teir vilja taka valgrættin frá okkum, kunnu vit jú velja saman við teimum, tá tað nýggja ríkið skal dannast. Eg hopi ikki Rasm. Rasmussen verður so grummur, at hann exporterar okkum; her eru tó so nógvir sambandsmenn, at viss allir skulu fara av landinum og laka alt, teir eiga, við sær, so verður hildur tómligt eftir. Føroyar klára seg ikki aleina við Rasmus Rasmussynum.

Eg eri sum sagt glaður yvir, at Rasm. Rasmussen hevur útdjúpað tað, sum Edw. Mortensen hevur sagt, og eg gangi útfrá, at heila partíið er einugt við honum. Hetta vil klára forskellig spursmál, sum hørfyri vóru meira óklár, og vit vilja royna at halda fast uppá tað. Rasm. Rasmussen hevur sagt, eisini tá hann stendur fyri veljaraðómstólinum

Edw. Mortensen: Tað er ikki rætt at siga at sjálvstýrið hevur sluttað seg til radikala partíið. Men eg sum fólkatingsmaður,

meldaði meg inn í ta radikalu gruppuna. Ég kenni ikki, um hinir sjálvstýrismennirnir eru radikalir ella ikki. A. Samuelsen hevur kravt í Danmark, at tey politisku partiini skuldu útbala seg móti sjálvstýrinum í Føroyum og hevur fimmist at, at teir radikalu og socialdemokratarnir ikki her hava verið honum til vildar. Tað vildi vera harmiligt og undarligt, um danska fólkið skuldi útbala seg ímóti eini nation innan fyri teirra egna ríki og sagt, at tey krov, sum Førovingar koma við, vilja vit ikki vita nakað av. Ein kann finnast at høgra og vinstra, at teir hava sagt nei, um vit krevja sjálvstýri. Tað er ikki heint gjort. Um landstingsnevndina sigir A. Samuelsen, at hon varð ikki niðursett til at granska føroyskan politikk. Vit siga, at ætlanin hjá henni var at granska føroyskan politikk yvirhevur. Og tað er gjort. A. Samuelsen sigir, at sjálvstýrisflokkurin hevur krógvað sítt programm. Sjálvstýrið hevur í 1906 framsett sítt programm; tað er broytt í 1969. Í 1915 fyriliggur eisini eitt programútkast. Tað er ikki krógvað, og A. Samuelsen kemur programmið fult út. Tá R. Rasmussen hevur talað um føroyskan ministara, so er harvið ikki sagt, at tað er sjálvstýrisprogrammið. Tað er R. Rasmussens programm. Tað punkt, sum her er fyri, er um lóggávuvald fyri logtingið. Hvat er Føroya statsrættsliga støða? Er hon so, sum hon eigur at vera, alla eigur hon at vera nakað annað. Tað er sakin. Føroyar hava eina serstaka støðu; tað geldur ein serstøk skipan fyri Føroyar. Er hetta ein støða, sum eigir at broytast? Í hesi skipan kann nógv loysast, uttan at broyta grundlógina. Viðvíkjandi lóggávuvald fyri logtingið halda vit, at tað kann gevast, uttan at broyta grundlógina. Vit hava t. d. skúlalógina, hvareftir logtingið og ríkisstýrið kann áseta reglur um skúlaviðurskifti. Vit hava t. d. lóg um geindaveiðu, hvar tingið ræður, tó at hetta annars skuldi hoyrt undir ríksdagin. Soleiðis við øðrum lógum eisini, hvar vit ráða. Eftir hesum vegi siga vit at ganga víðari fram og fáa yvirgivið frá ríkisleginum hansara makt í innlendskum málum. Vit vita, at í krígsárunum hevur ríksdagurin givið nógva makt frá sær til ymsar ministrar. Her í Føroyum hevur ríksdagurin soleiðis gjognum ministeriið givið amtmannunum nógva makt í samráð við logtingið. Um tað verður sagt, at uppskotið um tinglógina er í stríð við grundarlógina, ja, so taki eg konsekvensirnar og sigi; lat okkum so broyta grundlógina. Vit vilja ikki nú geva tinginum lóggávuvald gjognum grundlógina, men vit vilja opna okkum eitt portur, um hann nevndi vegurin til at fáa okkum lóggávuvald slær klikk. Um A. S. meinar, at okkara programm hevur verið krógvað, so kann hann opna posan og hyggja í hann. Hann dugir nokk at kaga í posar og vera posakiggara.

O. Effersøe: Selvstyrepartiets Politik har ikke været aaben. Jeg har i flere Aar været fremmest i den politiske Strid paa Færøerne. Jeg ved, hvor umuligt det har været at komme til en aaben og ærlig Forhandling, og hvordan de, som jeg har kæmpet imod, har sagt uden om. Selvstyrepartiets Aviser har i en længere Periode alene levet paa de saakaldte uretfærdige Beskyldninger« imod Partiet. Jeg er derfor glad over, at vi i Dag har faaet mere Klarhed gennem R. Rasmussens Udtalelser. Han krævede Lovgivningsmyndighed for Lagtinget, egen Minister, bosat paa Færøerne og ansvarlig overfor Lagtinget, og yderligere noget mere. Hvad var det, som R. Rasmussen holdt tilbage? Ogsaa han lider af den gamle Skavank at holde sig en Dør aaben. Mortensen derimod kom kun med det gamle. Han siger, at han vil nok forandre vor statsretlige Stilling, men ikke forandre Grundloven. Det er den gamle Kirkepolitik. Hvis det, som A. Samuelsen omtalte for, den Vej, som vi ønsker, ikke kan komme frem, ja, saa vilde jeg følges med R. Rasmussen og hugge helt igennem Knuden. Men jeg haaber ikke, at det skal komme saa vidt. R. Rasmussen udtalte, at Tinget var vor rette Repræsentation. Det vilde være heldigt, om det var det, ligesaavel som vore andre rette Repræsentationer. Men det nuværende Lagting repræsenterer ikke Flertallet paa Færøerne, og det skyldes, som R. Rasmussen ved, hans eget Parti, der har modsat sig en retfærdig Valgkredsinddeling og Repræsentation for Kredsene. Jeg forstaar saa udmærket godt, at d'Herr. Selvstyremænd, som i Fjor var Flertal, og sendte disse Sager ned til Ministeriet, nu maa være kede af at faa dem saaledes tilbage. De skyder nu Skylden herfor paa Mangler i vor Forfatning, men man maa ikke være blind for, at Sagerne har været af den Beskaffenhed, at de ikke har egnet sig til at fremmes. Det er let nok at stille ubillige Krav fra sig og saa skyde Skylden paa den statsretlige Stilling. Hvis man havde fulgt os i Fjor, var det gaaet paa en helt anden og bedre Maade med Sagerne.

R. Rasmussen: Eg noyðist at svara uppá sumt av tí, sum er framfort av ymsum talarum móti tí, eg havi sagt. Eg skal fyrst venda mær til hrr. Effersøe. Hann kemur fram við tí at hann altíð hevir fort og mannað øðrum til at føra ein erligan politikk. Tað er so ofta, at hesin tingmaður av Tvøroyri stígur fram sum predikantari, um eg so má siga, og manar okkum til at føra ein erligan politikk, men spurningurin er tann, um hr. Effersøe altíð hevir fort ein politikk, ið er erligur yvir fyri honum sjálvum. Vit skulu minnast, at hesin tingmaður var ógviliga langt úti í 1884 (ísínum ungu dogum), og so stutt síðani sum í 1905 var Effersøe heilt góður sjálvstýrismaður, sjálvt um sjálvstýrisflokkurin ikki var til tá, var hr. Effersøe fult út í yvireinsstemmilsi við teir menn, sum árið eftir stovnaði hendan flokkin. Men so knappliga, í 1906, sleer hann heilt um, tað sæst av einum lítlum neyðareggið ið vorpið var í Dimmalætting, og brátt liga varð klakt út til tann núverandi sambandspolitikk. Tað var ræðslupolitikkurin, hann birtí upp, at ræða Føroyingar við øllum tí, ið vildi henda um vit fingu sjálvstýri. Nú ræðist eingin longur hesa grýlu frá 1906, og nú kundi verið, at hr. Effersøe eins »elegante« og í 1906 nú loypur yvir í sjálvstýrisflokkin, eingin kann vita, hann hevir sýnt seg at hava haft ógviliga ymisar støður í so stuttari tíð. Øðrvísi er við tingmannunum úr Fuglafirði. Hansara sloða er fyri so vítt rein og greið, sum hann altíð hevir haft sonn støðu, síðani hann kom inn í politikk; hann hevir verið góður sambandsmaður. Andrass Sámalsson sigir, at sjálvstýrispartíið er ikki vaxið undir teimum kravum, tað hevir framfurt í Føroyum, men tí at tað hevir dult sítt programm, og í hesum gav Effersøe honum rakt. Andrass Sámalsson talaði so nógv um, at vit hovdu goymt okkara program í posa og fjalt tað og umballað tað. Nú havi eg ongantsum helst kunnleika til tann kunstin at goyma í posa, heldur ikki til at kaga í posar, men tað sigst, at Andrass Sámalsson dugir væl at kaga í posa, kanska harav alt hetta tosið. Hann meinar, at vit vunnu fram við at fjala okkara program; eg meini, at herí hevir hann ikki rætt, serliga ikki yvirfyri mær, tí í teimum stundum, eg havi staðið ímóti Andrassi Sámalssyni, havi eg latið mína meining vera heilt klára og einki krógvað. Vil man siga, at eg krevji meira nú, enn eg kravdi í 1915, tí at eg haldi uppi ein serligan ministara fyri okkum, so stóð í ólavsøkubræðinum, at vit skuldu hava ein umboðsmann, og tað kann gott vera ein ministari haðan av navni og gavni. Ólavsøkubræðið kann tá ikki væl sigast at vera krógvað í posa, tí tað var bæði diskuterað offentliga og kommenterað av sambandsmonnunum. A. Sámalsson talar um skilnað og samband, eg veit ikki, hvat hann meinar við. Er tað samband, at alt skal tálmast her á landi fyri at tað skal passa einum donskum ministerium? Er tað samband, at okkara fiskarar skulu ikki fáa teirra fulla rætt tí teir skulu stappast inn undir danska lóg og ikki mugu fáa eina lóg, ið bóskar serliga fyri teir? Er tað samband, at okkara lóg um bókføring skal skorast eftir donskum leisti, tá tann danska lógin ikki hóskar hjá okkum, men er beinan vegin skaðilig fyri okkara vinnulív? Er tað har, at Andrass Sámalsson vil hava samband og ræðist skilnað, so verður hansara samband Føroyum at búga, og tað er í hesum, at eg vil hava skilnað, og tað skilnað so tað munar. Men har er eitt annað punkt, hvar eg vil hava samband, og tað er við danskt andslív og danskan kultur eins og við norrønt andslív yvirhovur, og eg vil hava atgongd til danskt andslív, gjognum eitt mál, ið er okkara egna, so at ikki alt ið fingið verður burtur úr hert verður ein tóm skræða við ongum innihaldi, nakað, ið menn kunnu standa og erpa sær við, tó at aftanfyri er einki dygdugott. Soleiðis kundu vit Føroyingar mótt Danmon í fullum forstáilsi, á sama hátt sum Íslendingar og Danir nú tykjast at hava fingið forstáilsi, hvor av øðrum, til frama fyri báðar og til gott samvirki. Tað samband er ikki komið gjognum tvang og ónatúrliga tilpasning, men gjognum frítt samarbeiði, og á sumnan háttt. At hetta sjálvræði vil kosta okkum pening er sjálvandi, men vit mega lata hann um vit vilja hava sjálvstýri, og eg trúgvi, at við hava ráð til at lata tað sum tørvast.

Andr. Sámalsson vil siga, at landstingskommissiónin var niðursett einans til at granska forholdið Zahle—Rytter. Hon hevdi tó aðrar uppgávur og tað framgongur eisini nógtýðiliga av tí, sum sagt er í landstinginum, at hon í virkuligheitini er sett fyri at granska tey politisku forhaldini í Føroyum. Hon er niðursett av ræðslu fyri at Føroyingar ikki aleina arbeiða fyri skilnað frá Danmark, men eisini fyri einum møguligum tilknýtan til Bretlands. At forholdið Rytter-Zahle er eitt hovuðspunkt í hennara granskan er

einans tí, at hesir báðir menninir standa sum representantar, hvor sær fyri teimum ymisku meiningum, Danir hava um føroyskan politikk. - - Andr. Sámalsson spyr so, hvussu vit kunnu vera bekenntir at taka ímóti peningi frá Danmark, tá vit tó ikki eru tilfriðsir við forholdið, sum lað er. Eg skal minna A. S. á, at vit ikki aleina hava uppiborið tann pening, vit fáa, men ógviliga nógv aftrat; tað er ikki ein álmissa, vit taka ímóti, men ein skuld, eitt tilgóðahavandi, sum vit hava krav uppá, og sum átti at verið betalt okkum fyri langt síðani. Og vit noyðast at taka ímóti hesum pengum, tí okkum verða forðaðir allir ávegir til sjálvir at skaffa okkum pening. Tað nyttar ikki at rópa uppá, at vit jú hava amtsrepartitiónsfondsskattin; Danir hava ikki loyvi til at beita okkum til ein beskatningsmáta, sum teir sjálvir hava forlátið fyri langt síðani. Nei, lat okkum sleppa at skipa okkara skattalóg eftir teim somu reglum, sum eru galdandi alla aðrastaðni. - - Av tí at vit Føroyingar eru saman við Danmark sum felagsborgarar við somu rættindum, sigur Andr. Sámalsson, so hava vit eisini útvikling felags við Danmark. Hetta minnir um hin litla fuglin, sum setti sep uppá hin stóra fuglin og tá hesin fleyg upp í loft, so kom hin lítli hægri. Men harfyri bleiv hann ikki størri. Lat okkum t. d. hyggja at hvat Danmark hevur ofrað uppá sítt jarðabrúk og jarðabrúkið í Føroyum. Tað danska jarðabrúkið er verðið stydjað av statinum við milliónum og stendur nú í fremstu rekkju, meðan okkara er so langt aftaná, sum tað veru kann eisini eftir førimunni, tí tað ongan stuðul hevur fingið. Nú er tekin til at vit skulu fáa ein landbrúksskúla í Føroyum. Og so okkara skúlar --- bæði almennskúlarnir og serliga teir hægru skúlarnir! Hvat atgongn hevur eitt føroyskt barn til skúlaútdanningsi aftur ímóti einum donskum. Tak t. d. ein drong í Vík og ein á Sælundi. Hin má fyri at kosa viðari skiljast frá ollum sínum í langar tíðir, yvirlátin til seg sjálvan í einum frammandum landi, meðan hesin lættliga kann koma til og frá heimi sínum. Hetta honger aftur saman við samferðsilsmiðlunum. Hvussu er forholdið har? Ja, vit hava »Smirila« neyðardýrið, sum vit hava betalt í dýra dómar, og hevdu vit ikki hana, so var illa vorðið. Hvat hevur staturin kostað uppá sínar tradiknidlir harniðri og her? Og á hesula hátt kundi ein blivið við at nevnt dømi aftaná dømi. Hví skulu vit so fáast við at standa her og snakka um, at vit eru javnt við aðrar danskar statsborgarar í statsfelagsskapi? Slíkt orvitistos mátti ikki verið fyri vitugt fólk. - - Andr. Sámalsson lotast bilsin yvir tað, og skal hava sagt um muntlig krav, sum vóru framsett her í tinginum: tað, og segði, var, at sjálvt tey muntligu kravini, sum framkomin vóru, hevur tann danska regeringin roynt at ímotikoma, sjálvt um tað er misslukkað. Tað er altso beint tvørtímóti tí, hann vil leggja inní tað. — So er hann so heinasaunr at ráða sjálvstýrisnonnum at ganga til valg uppá teirra program og einki annað. Tað hava vit altíð gjort, og tað ætla vit framdeilis at gera, men, vit ganga ikki til valg uppá programmið til tað at Andrass Sámalsson so skal agitera fyri sjálvstýrinum og útleggja tað fyri veljarunum sum hann finnur fyri gott. Tað er jú ollum kunnugt, at hann lesur okkara programm sum ein vissur maður lesur bíblina. — Nú hevur Andr. Sámalsson altso játtað at logtingið er okkara rætta representatión, tað er harigjognum, at Føroyingar skulu útinna teirra valgmatt. Men so má hann eisini taka konsekvensurnar. Okkara rætta representatión kann jú ikki gera seg galdandi; tað heila, sum hon formáar sær, er at biðja ministeriið vera so gótt at taka sær av teimum uppskotum, hon ber fram til tað. Hetta hevði einki at sagt, viss ministarin av sonnum var okkara málstari og stóð logtinginum til svars, men tað er so beint tvørtímóti; hann hevur als onga plikt til at taka nakað hensyn til logtingsins ynskir, hann risikerar einki, um hann letur vera, men harímóti kann hann risikera nógv, um hann vil gera sum logtingið biður hann. Innanmar Andr. Sámalsson og sambandið at logtingið er okkara rætta representatión, so lati og ikki, at teir vilja upprætthalda tað til onga nytta. Eg kundi betri forstaðið, um teir sogdu: Við hutta lag nyttar einki at hava nakað logting; kann tað ikki fáa útint sítt starv, so lat okkum heldur niðurleggja tað! Tað kundi verið nakað í. Tað er nydileggjandi fyri Føroyingar úr undan úri at siggja teirra egnu, rættu representatión verða traðkaða undir fótum; tað ger teir dólskar og líkaglaðar. - - Viðvíkjandi forholdinum millum sjálvstýrispartíið og ministaran Zahle, sum Andr. Sámalsson er so interesseraður í, so er hartil at siga, at Zahle vel er einigur við okkum í mongum, men hann er jú ikki avhongugur av partistillingunum í logtinginum, men í ríkisdeginum. Tað kann tí henda, at um

hann fylgir løgtingsfleirtalinum, tjenar tað honum til minni gagn enn um hann hevði gingið ímóti tí. Sjálvt um sjálvstýrispartíið kann hava ein persónligum tókka hjá ministaranum, kann hann ikki gagna okkum, tí hann er settur uppá eitt annað fleirtal og undir heilt øðrum forútsetningum enn teir, ið eru galdandi her. Hann kann ikki alfíð ofrá sína missión í Danmark fyri at gera Føroyum til vildar, tí Danmark má verða honum nærri. Hetta forholdið veldur tann ómetaliga skeiva stilling, vit eru komnir í og at vit hava fingið allar hesar nógvu sakir blakaðar aftur. At ministarin sendir sakirnar aftur, sigur einki um hansara *persónligu* støðu til teirra; hann hevur bara ikki vilja lagt tær fram í fólkatinginum, tí hann er vísur í, at tær ikki verða framdar, og hann vil ikki skapa konflikt uppá tær har, tí tað kann verða størri málum at skaða. Tað er rætt sum Edw. Mortensen segði, at Andr. Samalsen eigur at halda seg til mín fyri tey óttalilsir eg frambar við; eg mátti bera konsekvensurnar. Tað skal eg eisini, men annans hevi eg ikki sagt annað enn tað, sum inniheldust í Ólavsokubrævinum, og tað vildi eisini verið vanskuligt hjá mær at fort nakað nýtt fram, tí alt hetta hevur ligið í sjálvstýrisprogramminum frá fyrsta degi av.

O. Effersøe: Hr. Rasmus Rasmussen betegnede mig som Prædikant. Det maa han gerne have Lov til; jeg har kun forfægtet mine Anskuelser. Men naar han sigter mig for personlig Uærlighed, da vil jeg tilbagevise saadanne Udtalelser som foragtelige og kaste dem tilbage paa deres Ophavsmand. Det er kun en Paastand, hvad han har fremført om min Stilling i 1884 og 1905 og i Strid med Sandheden.

A. Samuelsen: Mortenson visti ikki, um teir sum sjálvstýrismenn eru samsintir við Zahle. Jú, her hava teir sagt, at ministarin er samsintur við teir. Og R. Rasmussen segði, at ministarin var samsintur við teir í allari almindiligheit. Men tað letur til, at nú er ein kluft millum ministaran og sjálvstýrispartíið. Men higartil er tað í tíð og ótíð sagt, at ministarin og sjálvstýrispartíið er tað samma. Til Mortensen vil eg siga, at tað eg havi sagt, er, at ministeriið skal úttala seg klárt um teir spurningar, sum eru reistir av sjálvstýrispartinum. Eg havi viljað, at regeringin og við henni socialdemokraturnir skulu taka bestemta støðu til tað. So nevndi hann at tað var klárt úttalið í landstingsnevndini, at hon vildi granska føroyskan politikk. Tað stendur ikki í uppskotinum, sum hon er niðursett uppá, men tað frangongur, at mann eisini í arbeiðinum vil undirsølja um hetta. Vit sambandsmenn hava einki ímóti, at mann í Danmørk fær klárheit yvir okkara politikk. Og eg dugi ikki at skilja, at sjálvstýrismenn hava ímóti tí fyri teirra politiks viðkomandi. R. Rasmussen segði jú, at danskir ikki fata okkara politikk. Mortensen sigur, at tað er munur millum hann og R. Rasmussen og sigir seg standa á programminum fyri 1915. Men har talast jú um eitt umboðsmann. R. Rasmussens programm ídag er ikki eitt fet víðari enn programmið av 1916. Men Mortensen gor mun millum R. Rasmussen og seg. Sannleikin vil hann kanska uppfatoda á annan máta. Nú vil hann hava kgl. anordningar; kanske vil hann hava annað seinri. Tað er at skava aftur yvir. Í stundini heldur hann at R. Rasmussen hevur sagt ov nógv. Tað sum R. Rasmussen hevur sagt, kann skiljast av hvørjum manni. Men tað sum Mortensen hevur sagt, er vanskiligt at skilja hjá nógvum. Hann hevur umballað tað betur, men hann er jú eisini jurist. So sigir Mortensen, at hann vil gjarna vera við at fáa lyftispæragraffina inn í grundlógina, men ikki í eygablikkinum. Hví ikki í eygablikkinum? Hetta er eisini ein umballing, ein umballing í posaloriði, ella um hann ikki dámar hetta orðið, so í pappaskjti. Mortensen koyrir programmið har niður í. Hann sigur, at eg kann kyggja í posan; men teir hava koyrt aftur yvir. So tala teir um posakiggara. Tað var eitt blað, sum plagdi at skriva soleiðis um mig, tá eg var politifuldmektig. Men so hevur Mortensen verið konstituerøður posakiggari, og hann vil kanske sluppa at vera fastansettur posakikkari. Tá R. Rasmussen talar um Ólavsokubrævið í 1915, so var hann sjálvur óklárur tað árið. Tá vit vildu diskutera tað so tókn állir sjálvstýrismenn til at skava út yvir. Nú tykist einki ófort hjá R. Rasmussen. Tað vildi vera ynskiligt at vita, hvørjir av sjálvstýrisfingmonnunum, sum eru samsintir við R. Rasmussen, og hvørjir ið vilja skava út yvir. So kundi Føroya fólk fingið at vita, hvussu teir stilla seg. Vit sambandsmenn eru samsintir. R. Rasmussen segði, at orðið ministaria ikki kom fyri í Ólavsokubrævinum. Men eg havi skilt, at umboðsmaðurin er ministarin. Og R. Rasmussen sigir, at tað er rætt. Tað má Mortensen benda seg

fyri. Vit hava forkláraö, hví vit hava fingiö hesar sakir aftur. Um vit sambandsmenn høvdu rátt, høvdu vit vist ikki fingiö sakirnar aftur á hendan hátt. Fleirtalið hevur skuldina fyri, at vit hava fingiö sakirnar aftur, tí fleirtalið ikki hevur greitt tær frá sær í nóg góöum skili. Tá vit ráddu, so plagdu vit ikki at fáa sakirnar sendar aftur. So talar R. Rasmussen nakaö um skilnaö; eg havi skriveð upp her, at hann brúkti netnpp orðið skilnað, og eg havi brúkt tað rett, tí hasin politikkur vil fora til, at oll tey viktugastu bond verða loyst. Eg haldi ikki, at R. Rasmussen eigir at tala so nógv um sjónleringslógina. tí har hevir hann skyldina fyri, at tað er vorðið sum nú er, tí hann var jú formaður í nevndini, og hann hevir givið ov nógv eftir fyri einum kantórcheft. Um her nú verður vald ein kommissión, og R. Rasmusson, Edw. Mortensen og Nyholm Debess verða valdir í hana, og har so kanska kemur ein kontorchefur úr Danmark, ja, so veit man, at teir lata kontórchefin eiga alt raðið. So sigir R Rasmussen, at hann hevir einki ímóti at vit fáa eina stöðu sum Íslendingar nú. so eg trúgvi, at hann meinar, at vit skulu hava eina sovorðna stöðu. Harímóti vil hann hava samband uppá ein annan máta, og yvskir, at vit fáa okkara part av framstiginum í donskum andslívi, natúrligvís á føroyskum máli; og trúgvi, at eisini Íslendingar og Norðmenn yvskja at fáa part av framstiginum í donskum andslívi á teirra egna málum. so hatta kann alt vera ógviliga gott, men eg trúgvi einki gott til hatta sambandið aleina, serliga tá tað skal vera sum R. Rasmussen yvskir tað. R. Rasmussen meinar, at vit skulu betala, hvat sjálvstýrið kostar. og at vit hava ráð til at betala; ja, hatta er jú eitt klárt áttalilsi, og eg vil ráðn sjálvstýrismonnum til at slutta seg til R. Rasmussen, tí nú hava vit nakað at diskutera. Um hetta kunnu vit tosa utan serligan lidenskap, tí her tykist jú sum eingin vil burtur frá Danmark. E. Mortensen vil í hvussu er halda sær eina smogu opna. Fylgja vit R. Rasmussen, skal tað einaferð uppgerast. hvat vit hava til góðar hjá tí danska stati. Eg ætli mær nú, so leingi eg kann. at halda uppá mína stoðu, at vit eiga alt í felag, Danskarmir og vit, og eg veit, at R. Rasmussen hevir einki at halda seg til, tá hann meinar, at vit hava nakað til góðar. tað er bert nakað, ið kann vera gott at halda fram fyri fólki. Um tað var framhildið frá aðrari síðu oðrvisi, nemliga, at vit skuldu skylda statinum pengar. so vildi eg tikið somu stoðu sum R. Rasmussen. Men eftir mínum skjon, sum eg haldi vera líka gott sum R. Rasmussens, hava vit einki til góðar, uppá sum danskir statsborgarar hava vit fult krav uppá statskassan. R. Rasmussen segði, at vit sambandsmenn yvskti at vera saman við Danmark og yvskti at standa í stað, tí talaði eg um okkara landbrúk, vegir o. s. fr. Eg veit væl, at landbrúkið í Danmark, teirra vegir, skúlar o. s. fr. eru betri enn okkara. Men trýr R. Rasmussen, at tá vit fáa sjálvstýri, og her situr ein ministari, ið fer frá fjórða hvort ár. tí longri situr hann ikki, trýr hann so, at okkara landbrúk nakrantið verður líka gott sum í Danmark, at vit fáa líka góða atgongd til latínskúlar sum teir, líka nógvar jernbanar. líkar nógvar ferjur, ið sigla um beltini? Nei, har er nógv annað, sum R. Rasmussen bert ikki forstendur, hansara støða er ikki gjøgnumlugsað. Eg trúgvi einki uppá hatta, tí okkara land er væl oðrvísi enn hitt geografiska Danmark. R. Rasmussen segði, at hann og hansara partifelagar altíð hava gingið til valg uppá reint sjálvstýrisprogram, og tað vilja teir gera eisini nustu ferð; tað kann vera, at R. Rasmussen vil gera tað; vit siggja. at Edw. Mortensen ikki vil. og nú kemur an uppá hvussu nógvir fylgja R. Rasmussen og hvussu nógvir Edw. Mortensen. R. Rasmussen tók eitt forbehold; hann segði: og vil ganga til valg uppá mítt program, men og vil sleppa at fortolka tað sjálvur. Ja, tað hevði verið tað besta; maer dámar heldur ikki at fortolka sovorðið utan tá er neyðugt. tí tað er ókhárt: tað vísir seg eisini. at Edw. Mortensen hevir ikki forstaðið programmið. - - Táið sjálvstýrismenn koma at ráða, fáa vit óivað so mangar ministrar. at tað verður pláss. í hvussu er fyri allum teim forundi sjálvstýrismonnum. So tosar R. Rasmussen um. at eg havi sagt. at logtingið er okkara rætta representatión. Eg segði. at ríkisdagurin og logtingið er okkara rætta representatión, soleiðis sum tað framgongur av logtingslógini, eftir hvorjari logtingið er ráðgevandi. og eg eri glaður við at kunna siga. at tá vit vóru í fleirtali, tá góvu vit ikki onnur ráð, enn tey ið ministeriið kundi fylgja. og tað er meir enn tað kann nú. R. Rasmussen sigir. at justitsministeriið hevir tikið eina stoðu, men justitsministarin eina aðra. tað hevir R. Rasmussen ongan rætt til at siga. sjálvt um hesin justitsministarin við sínum tele-

grammi ífjør til amtmann Rytter tók eina slíka stoðu, ið ikki var vorttað av einum justitsministara, men eg trúgvi, at hann má vera gingin í seg sjálvan. R. Rasmussen segði, at sum nú er, var tað betri, um løgtingið var avtikið, tað kann eg onganluta vera samsintur við hønum í. Eg vil ikki avskaffa løgtingið, men tvørtímóti eiga vit at syrgja fyri, at tað altíð kann vera sovorðið fleirtal har, at tað kann geva fornuftig ráð, sum aðrir menn kunnu fylgja. Tað hava Føroyingar fingið ílag fyrr. Myrkar periodur hava altíð verið í Føroya sogu og fyri oygablikkið eru vit inni í eini slíkari periodu. Tað ræður bara um at fáa sjálvstýrisfleirtalið burt, so er løgtingið gott nokk. — Eg haldi, tað er drístugt av R. Rasmussen, viss hann einki skriftligt hevur frá justitsministaranum, at siga, at hann er einigur við sjálvstýrismenn í hesum málinum; ministarin er altso ein dupultur persónur, tað sum vit í føroyskum kalla tvískinningur. Eg trúgvi ní ikki, at hann er ein sovorðin maður, sum skrivar officielt til amtmannin eitt og persónliga meinar eitt annað. Hevur Rasm. Rasmussen nøkur brøv frá ministaranum, sum vísa hetta, so lat okkum endiliga síggja tey. Vit hava eina vissa interessu av at læra hendla mannin at kenna, hann er tó okkara ministari og justitsministari aftrat. Eg havi hópin enn. sum eg havi skrivað app, men eg skal lata vera at siga meir, tí vit hava longu fingið at vita nógv frá Rasm. Rasmussen, sum kastar klárheit yvir sjálvstýrispolitikkin. — Kommissiónin er meira komin í bakgrundina undir diskussiónini; Rasm. Rasmisson hugsi eg ikki hevur sagt nakað um alt hann vil hava hana ella ei, men Edw. Mortensen sigur seg vilja hava hana; tað er væl uppá floksins vegna. Tað letur annars til, at teir ætla at bróka hesa kommissión sum ein kassa, hvar ministerið skal kunna koyra alt hetta í: Løgtingslóg, skattalóg, studentafelags-uppskotið o. s. fr. So kunnu teir agitera víðari við ølhum hesum; tað liggur væl forvarað í kommissiónini. Hon verður nærmast ein bogravilsiskassi. So klókir eru sjálvstýrismenn.

Edw. Mortensen: Hr. Andrass Sámalsson skuldi helst líða við at tosa um, hvat vit fara at gera; tað vil vísa seg. — Eg má siga tað undrar meg, at hoyra Effersøe so harmfullan tilbakavísa beskyldningin fyri at dríva óerligan politikk «við forakte; tað hevur hann jú so ofta briksla ódrum. Tjóvur frýr, at hvør maður stjelur, tí hann stjelur sjálvur; nú kemur tað afturum aftur. Tá Sámalsson bríkar so óparlamentarisk óttrykk sum «durkdrivins o. tíl., so er hjá mær einki at svara; tað má falla aftur á hann sjálvan. Hann talar um «posakiggarara; og havi ikki kagað í nakran posa og ætli mær ikki at gera tað. — Teir tala um sjálvstýri, sum her var talað um fullan skilnað; tað er tað als ikki. Her kunnu vera fleiri mátar at ordna okkara statsrættsligu støðu uppá. Effersøe boskyldar meg fyri at hava drivið «lirkopolitikk» ella «lærkopolitikk», og at vera inkunsekventan; eg má siga, at er nakar inkonsekventar, so er tað sambandsmenn í teirra økonomiska politikki. Teir krevja at vera følags um øll tey røttindi, danskir borgarar njóta av statinum, men betala nakað fyri tað — nei! Teir mugu lata vera at tosa um politiska inkonsekvens. Eg eri ikki samsintur við Rasm. Rasmussen í hansara krav um ein serligan føroyskan ministara; ja, tað er nú mín stillingur, og hann er ikki í stríð við sjálvstýrisprogrammið. Løggávuvald fyri løgtingið — tað er høvuðspunktið í Ólavsøkubrævinum, og tað er ein klárur stillingur, eg havi tikið. Hitt um ministaran er eitt problem, sum menn kunnu hava ymiskan hugsan um.

R. Rasmussen: Eg forstandi ikki, hví Effersøe er so hugrordur av tí, og segði um hansara óerliga politikk. Hann mátti tó vita tað sjálvur, at tá ein býr undir glastaki, skal ein ikki blaka stein á annan, tí tað kann koma aftur um aftur. Hr. Effersøe hevur í øll hesi politisku ár haft eitt líkafrant speciali í at briksla mótstøðumonnum politiska óerligheit; at tað eina ferð verður vent aftur móti honum mátti ikki undra hann. Eg trúgvi ikki eitt menniskja kann brøyta sína hugsan so snøggliga sum Effersøe tykist at hava gjørt, tá hann saðlaði um í 1905—06. — Andr. Sámalsson vísir á, at tá sambandið ráddi, tá komu ikki sakirnar aftur frá ministeriinum. Nája, tað er ein hin besti mátin at fáa alt sítt ígjøgnum, ongatíð at vilja annað enn tað eins yvirmenn vilja, ikki at krevja annað enn teir vilja fremja. Og løgtingið hevur altíð undir sambandsfleirtalinum varað seg væl fyri at framseta krav, sum tað kundi vænta ikki at fáa framd. Tó vóru fyrr í tíðini einstakir menn imillum, sum bóru krav fram, ið ikki vóru fylgd; og skal nevna harimillum sýslumann Effersøe í 1890

og Sehrotar sála í 1884. Men hin fasti sambandsstokkurin fann seg altíð væl til rættis í ikki at krevja meir enn teir framumanundan vistu seg kunna fáa. Kravini vóru oll og mest sum aleina peningaligir studningar frá Danmark. — Andrass Sámalsson hevur her eina merkiliga støðu, sum er eyðkend fyri hann. Her í tinginum vil hann helst siga, at vit Føroyingar eiga einki tilgóður hjá Danmark, men uttandurs uggar hann Føroyingar við at yvirfyri ministaramum standur hann uppá okkara rætt, at Danmark skyldar okkum nógso mikið. Her er tað felagsskapið, hann rópar uppá; at vit lítið og einki lata til hetta felagsskap generar ikki hann. Hvat kallar ein slíkar skapningar, sum súgva til sin av øðrum og einki láta? Við einum frummandum orði eru teir nevndir »parasitar« og tað er eingin verdugur stillingur at vera parasit. Eg betrakti ikki Føroyingar sum parasitar, tí eg meini, teir hava rætt til at krevja av Danmark, men ifylgi hansara sýn uppá okkara stilling í felagsskapinum beteknar hann Føroyingar sum parasitar. Og hann blúgvast ikki við tað. Hansara og sambandsins politikkur er, at vit við voldum skulu passast inn í hetta felagsskapið eins og sagt er frá í hini gresku sognini um Prokrustos og song hansara. Var maðurin avlangur sum skuldi liggja í henni, kappaði risin bara av honum, var hann ovstuttur toygdi hann nannin nógmikið. Í hvussu var doyði maðurin. Sambandspolitikkurin hevur sama atburð og úrslitið verður eisini tað sama. Tí eiga vit at halda uppat við hesum óskili, meðan tíð er; annars verður ringur endi. — So krevur Andr. Sámalsen bevís fyri, at Zahle er einigur við okkum, tó hann ikki vil fremja okkara krav. Tað er nógmikið bevist í tí, at ministeriið ikki kann existera, um tað ikki hevur fleirfal í fólkatinginum; — tað var væl í simari tíð ein danskur kongur, sum í mong ár regjordi uppá minnitalið, men tað siga menn er ein fínur kunstur — ministarin kann persónliga vera í yvirloinsstemmilsi við Hoirtalið í løgtinginum, men tey politisku forholdini eru soleiðis vorðin, at tað kann vippa hann yvirenda, um hann letur tað ovnógv til sjóndar. Tað verður hjá honum sum at balansera á eini knívsogg, og tað einasta kriatúr, sum í longdini kann tað, er ein snigil.

O. Effersøe: R. Rasmussen undrer sig over, at jeg blev vred over hans Udtalelser. Han sagde, at jeg har givet Anledning dertil ved mine Udtalelser. Det, som R. Rasmussen fremførte, var en Beskyldning mod mig for personlig og bevidst Uærlighed i Politik. Jeg har fremført den Udtalelse, at Selvstyrepartiets Politik ikke var aaben og klar. Og jeg sagde til Mortensen, at der benyttes Lirkepolitik. Dette er ikke Beskyldning for personlig Uærlighed. Om der er nogen Person, som har faaet det Indtryk, at denne Politik er uærlig, saa kan d'Hrr. takke sig selv for, at de har faaet Skinnet imod sig. R. Rasmussen talte om 1884. Men den Gang tog jeg ikke Del i Politik. Og hans Udtalelser om 1905 er Usandhed. Jeg har Grund til at sige, at Selvstyrepartiet ikke har ført en aaben og ærlig Politik, idet det har brugt en Metode her og en anden nede i Danmark. Hvad er det nu, vi er Vidne til her idag? Det ene Medlem af Selvstyrepartiet vil have det ene, den anden vil have noget helt andet. Men hvad vil saa de andre Herrer, som her sidder tilhørende samme Parti? De kommer ikke frem med, hvad de mener. Hvad skal man nu tænke? Hvad er Partiets Politik? Saa blev der sagt, at vi ikke førte nogen konsekvent Politik, idet vi ikke vilde paatage os de naturlige Byrder, som lagdes paa os. Jeg har aldrig nægtet vor Pligt til at opfylde vore Forpligtelser overfor den danske Stat, og det har mine Partifæller heller ikke. Men det er ikke min Opgave at sige, hvor meget der skal paalægges os. Det er mig uvedkommende. R. Rasmussens Beskyldning mod os for at være Parasiter, er ganske uberettiget. Til Mortensen vil jeg sige: Lad os faa Klarhed! Lad os faa Kortene paa Bordet! Hvad er Selvstyrepartiets Politik og Program?

A. Samuelsen: Eg havi sagt, at Mortensen ikki er valdur í ríkisdagin á sjálvstýrisspartsins programm. Eg veit, at menn, sum slutta seg til sjálvstýris flokkin, hava sagt fyri veljarum, at teir stóðu uttanfyri partiið. Eisini seinni hava menn roynt at fjala teirra programm. Mortensen sigur í sínum talu til mín tey orð »Tyv tror hvert Mand stjaalerø« sum um hann hevði roynt tað sjálvur. So segði Mortensen, at vit fora eina ókonsekventan politikk. Effersøe hevur nu talað um tað. Nær er tað hent, at vit ikki kundu fáa allan tann rætt sum annars danskir statsborgarar hava? Sjálvsagt kunnu vit ikki fáa jernbanar og tílíkt. Men eg haldi tað vera ókonsekvent av Mortenson at krevja lóggávuvald fyri

tingið og ikki ministara. Her er R. Rasmussen meiri konsekventur. Eg má anntaka, at Mortensen er so klókur, at hann sigur, at vit nýta ikki meiri lóggávuvald, og at tað kemur av sær sjálvum. Hann sípar til Íslands. Men tað var kanske tað skilið, sum har var, tá tordi til, at Íslendingar nu eru farnir burt frá Danmark. Tað er eingin ivi í, at sjálvstýrismenninir ikki hava lagt kortini á hordið. Herí hevur studentarin, sum skrivaði í blað í Keypmannahavn, rætt. Tann uppfatan hevur Føroya fólk um sjálvstýrið. Lirkopolitik er gott orð fyri hesum atburði. Eg vildi fingið hetta orðið týtt á føroyskum. R. Rasmussen sigir, at vit sambandsmenn ikki framsettu krov í okkara tíð, og tí fingu vit aldrinn sakirnar aftur. Vit framsettu krøv, sum tá vóru hildin fyri at vera stór, so stór, at enntá sjálvstýrismenn hildu, at tey ikki fingust igjognum. Harímillum var havnasakin, telefonin o. s. fr. So kann nann siga: ja, havn er eingin komin enn. Men tað má man skylda veraldarkríggið fyri og ikki okkum. R. Rasmussen talar um landbrúksskúla. Tað sær út at ganga trekliga. Men vanskeligheitirnar koma ikki fra sambandsmonnum, og tær sýnast heldur ikki at koma úr Danmark. So talar R. Rasmussen um tað vit áttu til góðar í Danmark, og at eg var tilbøjeligur at meina, at vit einki átti til góðar. Tað kann jú blíva undirsokt, hvussu tað er, men eg meini, at vit hava einki til góðar. R. Rasmussen meinar harímóti, at vit hava nógv til góðar og at vit lata einki. R. Rasmussen má kunna forstanda, at vit hava nakað at krevja, tá vit standa í sama felagi. Eg segði í gjár, at vit vóru børn av sama stati. Lat okkum brúka eitt bílæti. Um vit hava eina kommunu, so eru allir skattaydarar undir somu lóg, men teir lata ymist eftir teirra okonomiski evni, tó tann ið letur lítið, hevur líka stórt krav uppá kommununa, sum tann ið letur mest. Um vit hovdu ein millioner í Havn, vildi hann botalt nógvar ferðir stærri skatt enn Rasmus Rasmussen, men hann hevði tó havt sama krav uppá kommununa sum millionerurin. Eg vil pástanda, ikki, at vit eru kreditorar, men at vit lata forholdsvís líka nógv til statskassan sum teir har niðri. Man kann ikki venta, at vit skulu lata nakað til jernbanar t. d., tí vit hava ongar jernbanar o. s. fr. So leingi tað ikki kann bevísast, at vit betala ov lítið nú tað vera, at vit betala nóg nógv og hava somu krav sum hinir. R. Rasmussen kann ikki vera bokentur at taka konsekvensin av sínum tankagangi. — Eg vil taka tann spurning upp: hvussu mangir sjálvstýrismenn munu vera samsintir við R. Rasmussen, og hvussu mangir við Edw. Mortensen? Eg meini ikki, at tað er so stórur munur á teimum, men teir meina tað sjálvir. Teir vilja gera Føroya fólki eina stóra tænastu við at upplýsa tað. Eg vænti mær einki svar, men eg trúgvi, at teir allir í virkuligheitini eru samsintir við R. Rasmussen. R. Rasmussen talaði um ministaran. Hann segði, at væl hevði hann einki brævt frá hrr. Zahle, men at hann trýr, at um justitsministarin kundi framt hesum, so vildi hann; eg meini, at hatta er ein insinuatión ímóti hrr. Zahle. R. Rasmussen talaði um landstingskommissiónina; eg havi frætt, at hann hevir verið fyri har, og eg hopi, at hann har hevir forklárað, at hann uppfatar ministarans telegram ífjor higar soleiðis, at tað játtar sjálvstýrispolitikkinum og serliga ministaran. R. Rasmussen sigir fleiri ferðir, at ministarin hevir ikki fleirtal í fólkatinginum. Eg veit ikki betri, enn at hrr. Zahle hevir fleirtal í fólkatinginum, men tað kann vera, at fleirtalið ikki vil fylgja honum í hesum. Tað kann vera, at R. Rasmussen ikki hevir verið upplagdur til at hava skil á munin millum fólkating og landsting, tá hann talaði iáðni, men tað vildi já verið ein roynd at vita, hvussu landstingið vildi tikið ímóti hesum, og tað vildi ikki verið fyrstu ferð, at justitsministarin fekk nakað broytt í landstinginum og hevir tikið ímóti tí.

R. Rasmussen: Tað tykist ikki at lata at svara Andrassi Sámalssyni aftur, tí nú tykist hann ikki longur at skilja alment føroyskt mál. Havi eg sagt, at hr. Zahle ikki hevir fleirtal í fólkatinginum? Eg skal siga tað eina ferð uppaftur. Tað er: at ein danskur ministari væl kann hava fleirtal fyri sær í fólkatinginum, men hvørfyri ikki behovir at hava tað í logtinginum, tí partídeilingin her og í Danmark er komin í lag av ymiskum grundum eftir ymiskum linjum; hvussu kann so hann, ið er valdur eftir donskum politikki, altið representera fleirtalið á logtingi? Eina ilha gongst Andrassi Sámalssyni við sínari umtalu av okkara skattaforhold til statin; hann brúkti har eitt líknilsi, ið ikki bert hevði tann feilin, ið er almindiligur við líknilsir, at tey halta, men hetta hevði bert eitt bein. Tað er jú so, at í somu kommunu eru allir skattaborgarar undir somu lóg, meðan forholdið er soleiðis

millum okkara og Danmarkar, at vit hava einki við tá donsku skattalógina av 1903 og aðrar, ið seinni eru komnar, at gera; tær gelda slett ikki hjá okkum. A. Sámalsson má ikki siga, at allir Føroyingar eru so fátækir, at teir ikki kunnu gjalda statsskatt; her eru kortini rættiliga mágvandi menn, og A. Sámalsson kennir óivað onkran nóg so væl, ið vildi komið til at betala ein rættiliga stóran statsskatt, um hinar donsku skattalógirnar guldu her í Føroyum. Ifanda talan av A. Sámalssyni tyktist mær heilt ógreið. Heldur ikki var avsluttningurin heilt góður av hansara umtalu av havnaforholdunum í Føroyum, hvar hann segði, at ein sjálvstýrismaður stóð ímóti hesum verki, meðan sambandsmenn stóðu saman um at fremja hetta mál. Eg má vera ógviliga blindur, síðani eg ikki við mínum besta vilja kann síggja tað minsta til tær nógvu og stóru havnir, sambandið hevir fingið okkum gjørdar í Føroyum. A. Sámalsson sigir, at kríggið hevir gjørt, at arbeiðið ikki er komið í lag. Kríggið kom í 1914, og har var góð tíð til at fáa nakað í lag, áðrenn fordingarnar komu, men einki kom í lag. Nú er kríggið hildið upp og einki frættist enn um at nakað verður gjørt. Tað hevur verið rópt upp um, at eg skal havi sagt meira enn tað eg nú krevji: ministara og lóggávuvald. Eg haldi hesir menn munu hoyra yvir seg. Eg havi eina ferð snakkað um Ísland og sagt, at eg var glaður yvir, at nú var komin somja millum Ísland og Danmark, at har var skapt virkulig semja og at tað sama var eftir ynskjandi hjá okkum. Um teir meina, at eg harvið hava vilja drivið føroyskt sjálvstýri við íslenskum fyribílæti, veit eg ikki, men teir vita væl tað at Íslendingar hava frá fyrndini haft ein annan stilling yvirfyri Danmork enn vit. Okkara stillingur hevur verið ringari og somikið sum hann er ringari, somikið koma vit at verða ørvísi stillaðir, sjálvtum vit vinna okkara rætt fullt út. Nútíðin hvílir á hvat í fortíðini hevur verið. Eg vildi ynskt, at okkara fortíð hevði verið eins og Íslands í hesum samanhangi, so kundi framtíðin eisini verið tann sama, men tað gerst nú ikki og tí vil eg ikki ráða til at stíla okkara sjálvstýri javnbjóðis teirra. Eg eri tornoyddur kortini.

Andrass Sámalsson tyktist so fegin yvir at kunna konstatera ein kíla millum meg og Mortensen. Hann skuldi ikki selt skinnið, áðrenn hann hevur skotið bjørnina. Lat okkum síggja eitt løgtingsvalg og vita, um har er nokur óeinigheit í tí valgumdømi, eg siti fyri, ella eitt fólkatingsvalg; so kunnu vit fáa at siggja um sjálvstýrið er samlað ella ei, um tað er minkað ella vaksið.

Edv. Mortensen: Andr. Sámalsson hyrjaði so harðliga við at ávísa, at lóggávuvald var ómuguligt at fáa, uttan samtíða at hava ein serligan ministara. So fór hann at hála íland — hann var ivaleyst komin at hugsa um Ísland, tí har sat ein danskur ministari eisini sum íslendskur ministari í 50 ár. Nú sigur hann, at hesi 50 árini vóru Íslendingum ein vána tíð. Tað veit eg ikki — í hvussu, er fáa vit lata framtíðina ráða fyri, hvussu hon kann blíva hjá okkum.

A. Samuelsen: Eg veit at henda tíðin í Íslandi verður betraktað sum eitt tilbagelagt Stadium, sum tey siga á ókunnugum máli, tá teir høvdu ministara sitandi í Koypmannahavn. Tað er munur millum Íslendingar tá og okkum nú. Teir høvdu ein heilt annan stilling. Vit eru ein partur av ríkinum, tað eru teir ikki og hava ikki verið í tann máta. — Rasm. Rasmussen segði áðuni, at eg var móður, eg kann við absoluttum rætti siga um hann, at hann er horvin. Eg eri ikki móður, eg eri klárur at fortseta diskussiónina alt kvold, imorgin, altíð, tær tað skal vera. — Hann segði so nakað meir um, at ministarin nokk vildi framja sakirnar, men tað bar honum ikki til. — Eg forstandi hann so, at ministarin ikki roknar við at hava fleirtalið í ríksdeginum við sær fyri hesum báðu politisku føroysku máhunum. — Síðani tosaði hann um mín samanlíkning við eina kommunu og okkara stilling í kongaríkinum og segði deils, at hann haldi, deils at hann bara hevði eitt bein. Eg veit ikki hvussu ein maður við einum beini í gongur, um hann haltar ella ikki; eg hugsi hann standur í stað. Eg segði, at forholdið var eins í eini kommunu og í samfundinum: at teir ymsu limir betala hvor eftir sínum fortimmi, men harfyri eiga teir sama rætt. Hetta bílæti haltar ikki. Tær donsku skattalógirnar galda ikki her, men tað bevirkar ikki, at okkara tilskot frá stáðinum verða fordadi. Hetta er tó nokk tað sjálvstýrismenn vilja prenta inn í veljararnar og so straumma tað so at tær donsku skattalógirnar koma at galda fyri okkum. Harvið hopa teir at fáa allar Føroyingar yvir í sjálvstýrisflokkin. Men eg hopi ikki, at teir ráðandi í Danmark ganga í tovið uppá hetta og heldur ikki Føroyingar. — Há-

nandi spyr hann so: Hvar eru havnirnar? Havnalóg hava vit nokk, men hon er tóm. Hann insinuerar altso at tær donsku myndigheitirnar geva okkum lógir til eitt uggilsi, men so einki meir. At vit ouga havn hava fingið, eru sambandsmenn í hvussu er ósekir í. Havnalógin var viðtikin 1½ mánað, áðrenn ministeriið Berntsen gekk av og tað byggjast ikki nógvar havnir í 1½ mánað. So kom ministeriið Zahle, sum hevur sitið síðani. Hví hevur tað ikki framt hesar lógir? Tað er altso hansara administration, sum er skyld í, um Føroyingar av teirri grund venda sær frá Danmark. Síðani kríggið kom, hava teir tó verið umskyldir, eftirsum tað, ið brúkast skuldi ikki kundi skaffast. Eg havi í hvussu er ikki staðið ívegin fyri at byggja havnir í Føroyum, skyldin má falla á ministeriið. Men eg haldi sum sagt ikki Rasm. Rasmussen hevur nakran rætt til at hána teir fyri tað. Eg kann annars nevna eitt annað dømi um at vit fingu stór ting ígjøgnumført: telefonina. Áðrenn 1905, tá Patursson sat í ríksdeginum kundi hann ikki fáa eitt oyra til tað; so sendu vit okkara mann niður og hann fekk studning uppá fleiri 100,000 kr. Tað er til skjals. — Eg havi ikki úttrykt nakra gleði yvir óeinigheitina millum Rasm. Rasmussen og Edw. Mortensen, tað interesserar meg ikki so storkt. Mortensen sigir, at hann krevur einans lóggávuvald tí hann heldur, at hann tá fær ministaran fyri einki, og at tað er sum eingin munur millum hann og R. Rasmussen. Hetta er ikki fyrsta ferð, at sjálvstýrismenn ikki eru samsintir. Men teir plaga at renna saman aftur við valgini. Og tað vera teir noyddir at gera einaferð enn.

R. Rasmussen: Nú sær út til, at sakirnar eru nakað vel útdebatterudar. Tí A. Samuelsen kemur nú framm við telefonini, sum sambandsmenn skulu hava fingið flag. Hvussu tá gekst til, tað minnast fólk. Effersøe kom tilfeldigvís at vera fólkatingsmaður, tá bevillingurin til telefonina skuldi sokjast. Hann interesseraði seg serliga fyri at fáa Suðroy í kaðal samband við hinar oyarnar. Men skorri gleði hava vit jú ikki havt av hesum kaðalinum. Hvør hevur reist telefonsakina í tinginum og hvussu er hon blivin gjøgnumført her? Tað er ikki við sambandsstemmum. At teir neyðtvungnir gingu til tað, tað takkar eingin teimum fyri. Tá A. Samuelsen skyldar meg fyri hán ímóti tí danska fólkinum, tá er hetta ein av teim óforskammenheitum, sum vanar eru at koma frá honum.

A. Samuelsen: Eg segði vit hevdu skaffa pening frá statskassanum til telefonina. Tingmaðurin í Kirkjubø kom aftur úr Danmark og segði, at hann kundi ikki skaffa nakað. So kom Jóffersøe í 1906, og hann fekk fleiri 100,000 kr. Viðvíkjandi káplinum í Suðroyafirði, so stemmaðu allir tingmenn fyri at leggja hann. Tá R. Rasmussen heteknar nakað sum og segði fyri óforskammenheit so líkist eitt slíkt úttrykk honum akkurát. Tá tað sigst, at einki ur spurt burtur úr havnasakini, so er tó eitt sindur komið burtur úr. Vit hava fingið Sandoyarvegin. Hann stendur eisini í Havnalógini. R. Rasmussen spælir komedíu frá sínum plássi, men tað batar honum lítið.

Formaðurin: Jeg vil anmode om, at Sagen bliver ført tilbage til det, som foreligger.

R. Rasmussen: Tá A. Samuelsen beskyldar meg fyri hán móti tí danska fólkinum, so skal og pástanda, at tann størsta hán, sum Føroyingar hava hegingið, er at hava sent A. Samuelsen sum fólkatingsmann til Danmark.

A. Samuelsen: Tann spurningin kann eg láta til veljararnar at døma um. Eg eri glaður at Føroya veljarar hava sent meg niður og fegin at R. Rasmussen ikki hevur stemmað uppá meg. Hevði hann gjort tað, so vildi eg haldið tað fyri eina skomm at fara til Danmarkar sum fólkatingsmaður.

R. Rasmussen: Nú sær út til, at sakirnar eru nakað vel útdebatterudar. Tí A. Samuelsen kemur nú framm við telefonini, sum sambandsmenn skulu hava fingið flag. Hvussu tá gekst til, tað minnast fólk. Effersøe kom tilfeldigvís at vera fólkatingsmaður, tá bevillingurin til telefonina skuldi sokjast. Hann interesseraði seg serliga fyri at fáa Suðroy í kaðal samband við hinar oyarnar. Men skorri gleði hava vit jú ikki havt av hesum kaðalinum. Hvør hevur reist telefonsakina í tinginum og hvussu er hon blivin gjøgnumført her? Tað er ikki við sambandsstemmum. At teir neyðtvungnir gingu til tað, tað takkar eingin teimum fyri. Tá A. Samuelsen skyldar meg fyri hán ímóti tí danska fólkinum, tá

Formaðurin: Personlige Spørgsmaal maa udgaa af Diskussionen.

O. Effersøe: Jeg maa sige, at jeg ikke deler R. Rasmussens Udtalelser.

Sakin varð beind í sumarnevnd.

Fundur fríggjadag 15. august.

Rættargongdarlóg fyri Foroyar.

(2. viðgerð).

Edw. Mortensen: Hesin spurningur um rættargongdarlóg fyri Foroyar hevir verið fyri fleiri ferðir fyrr. Nevndin hevir samrátt við amtmannin, og hann mælir til at bíða við hesari lóg, til ein sær, hvussu lógin verður endiliga niðri í Danmark; har er tað ætlanin at broyta hana eitt sindur. Nevndin heldur, at hesin spurningur er so umráðandi, at vit skjótast gjørligt mega fáa bott um okkara rættargongdar skipan og fáa hana broytta á nútíðar hátt, men heldur tó, at logtingið sjálvt fár eingi kann gera. Nevndin setur tí fram soljóðandi uppskot: sakin verður útsett til næsta ár.

Málið fór til 3. viðgerðar.

Vernd av fiskayngli.

J. H. Poulsen: Tað kom til eykatingið í vetur ein umsókn frá Færøernes Rederiforening um at royna at fáa uppaftur tikið tað internationala arbeiðið, ið áðrenn kríggið var gjørt av teim ymsu londum fyri at nøra um fiskin, og fáa hetta arbeiði útvíðka til eisini at galda Foroyum. Tað var so vorðið, at vit vistu ikki reiðiliga tá, hvat hetta arbeiðið gekk út uppá, og tað var tí samtykt, at útseta sakina til ta ordinera tingsetu og biðja amtmannin sokja upplýsingar um hetta arbeiði. Amtmaðurin hevir so spurt fiskarídirektor Olsen, og hann hevir sent frágreiðing til tingið. Hann sigir, at alt tað internationala arbeiðið hevir verið stedgað undir krígnum, og hvørt land hevir arbeitt fyri seg, og at nú hevir maður royndt at fingið eitt samlað úrslit burtur úr. Fyri nordsjógvin eru teir kommir so vítt, at teir vilja fyrisláa at friða reydspreksur, men ikki eru teir kommir so vítt við arbeiðinum viðvíkjandi toski, hýsu og sild. Í næmasta framtíð gerst eingi annað, heldur hann, enn hvat hvørt land kann gera innanfyri sítt egna mark, og tað verður væl helst ikki annað, enn ikki at fiska smáan fisk. Hann vil eingi tilmæla, vit kunnu kanska gera okkurt her nærindis okkum sjálvum. Men hvat kunnu vit gera? Her hevir verið tosað um forboð fyri at fiska seið, ella um forboð fyri at fiska fiskayngul yvirhovur. Nevndin hevir kortini ikki hildið seg hava mandat til hetta, og vit hava tí tilmælt, at sakin verður útsett inntil víðari.

Hesum varð samtykt.

Uppskot um hækkan av løn hospitalsskattmeistarans.

Formaðurin: Denne Sag drejer sig om et af Amtet fremsat Andragende til Justitsministeriet om Ændring af Lønnen til Kassereren ved Færø Amts Hospital. Det foreligger her til endelig Afgørelse, da det ikke drejer sig om et almindeligt Tinganliggende, men om Svar paa en af Amtet fremsat Henvendelse.

J. H. Poulsen: Formaðurin greiddi frá hesum við 1. viðgerð, at hetta var eitt uppskot frá hospitalsdirektiónini um at hækka løn skattmeistarans frá 80 kr. upp í 500 kr. Tað er eitt nakað stórt lop, men arbeiðið er vaxið so ógviliga nógv, og tað er nú o. u. 25,000 kr. hann inkasserar, so lønin má nakað svara hartil. Nevndin skal stýðja hetta uppskot um lønhækkan.

Hesum varð samtykt.

Skúlahús í Leirvík.

(1. viðgerð).

Prátmaðurin: Eg skal loyva mær at vísa sakina til kirkjukassanevndina: hon er nakað lík so nógvum øðrum søkum, har eru.

J. Samuelsen: Í Leirvík hevur í mong ár verið ein skúlastova, sum er uppford við tilskoti frá statskassanum; hon hóskar ikki longur til bygdina, dáls er hon gomul, dáls svarar hon ikki til nútíðarkrav í aðrar máta. Hon er ovlítil tí bygdin er vaxin ógviliga nógv. Nú er meiningin at byggja eisini hús til lærarar, sum eingi hús hevur nú og ætlan er at byggja so stórt, at har kann bliva leyligheit til ein annan lærara. Har eru so nógv børn í bygdini, at tað ivaleyst er ógóligt hvørt at hava ein lærara. Tað liggur í okkara interessu at gera hvat vit kunnu fyri at

hjálpa forstandarskapinum til at fáa eina hóskandi skúlastovu og nógmikið av lærarakreftum, so undirvísningurin kann bliva sum hann eigur at vera. Dýrt vil tað verða, tað vita vit; tað vanliga tilskotið fer slett ikki at forslá. Sum konir menn siga frá kostar tað tríggjar ferðir so nógv at byggja nú sum undan krígnum. Tíverri hava vit eingan plan ella yvirslag at kanna eftir, men tey skulu koma, meðan tingið er saman. Tey vóru ikki hóug, men Leirvíksmenn vildu hava andragandið inn, so tað kundi koma fyri í hasi tingsetuni. Langt undan Ólavsoku hovdu teir vent sær til ein mann at gera tekning og yvirslag. Eg skal anbefala sakina uppá tað allarbesta.

S. P. úr Konoy: Til tað, ið framført er skal eg upplýsa, at tekningarnar eru lidnar, men maðurin er ikki blivin liðugur við yvirslagið og andragarnir hava tí vilja bíða at senda tekningina. Viðurskiftini í Leirvík eru, sovorðin at har eru 110 skúlapliktug børn og bert ein stova og ein lærari. Teir hava roynt at bíða sum longst við at fáa ein lærara aftrat til tess teir kundu fáa hønnm inuivist, tí tað gongst ógviliga tvørligt. Vit mugu skaffa lokali, tað er einki annað at gera. Keðiligt er tað, at vit við fyrstu viðgerð av so stórari sak ikki hava eina tekning at halda okkum til, tí tað hevði verið heldugt fyri tingið at vita, um tað vil fylgja tí plani og teim princippum, hesin byggmeistarin hevur ávíst. Fyrr ella seinni noyðast vit at taka støðu til uttin vit skulu halda fram við tí byggjumáta, hegartil hevur verið, ella sláa um uppá tey princippir, ið galda niðri í Danmark.

O. Effersøe: Det er en ny Skik denne med to Lærerboliger, men det er mulig nodvendigt at slaa ind derpaa. Jeg vil blot stille Spørgsmaal om Forholdene har forandret sig saa meget, at det er nodvendigt at opføre 2 Boliger. Det er jo overordentlig dyrt at bygge nutildage, og der er ingen Udsigter til, at det snarlig bliver billigere. Hvis der altsaa ikke foreligger meget tvingende Grunde, bør man sikkert overveje, om ikke den ene Lærerbolig kan udskydes. Tidligere har det dog været muligt at faa Logis til en yngre, ugift Lærer.

S. P. úr Konoy: Hetta seinasta hóskar ikki, tí sum dømir vísa gongur tað ógviliga illa at fáa einum lærara inuivist. Fólk hevur gjarna ikki so stóra leyligheit og hartil komur, at tey ikki gjarna leggja tað gjald á læraran sum kostarhald og lógis krevur, men sum hevði tikið meginpartin av lærarans lon. Tað er ikki langt síðani Fuglafjørður fekk lærarinnu; henni gekkst ógviliga illa at fáa inuivist og samaleiðis við øðrum læraranum í Søldarfirði. Tað er rætt nok, at tað er dýrt at byggja, men tvorligt fer tað at vera at uppretta nýggj embætir og ikki hava nakað stað til tann frammanda mannin at búgva í.

Prósturin: Um hendaspurningin: hvussu vítt tað er neyðugt at byggja stórri enn áður hevur verið gjort, vil eg siga eini tvey orð. Vit vita allir hvussu viðurskiftini hava verið og eru við skúlahúsum: Har er ein stova, so eitt lítið kamar, síðani eitt tómt loft. Tað lítla kamarið hevur helst verið roknað til upphaldsstað hjá einum ógiftum lærara, men tað verður ikki nýtt; ovlítið sum tað er við ongum ovni og illa liggur tað fyri. Tað er tí mest goymsla fyri skúlasakir. At viðurskiftini eru tvørlig við at fáa inuivist er ivaleyst; hvørki fólkini, ið hýsa skúlalæraranum, ella lærarin sjálvur vilja gjarna gera seg bundin hvort av øðrum og tað sleppst ikki undan har trongrúmt er fyri. Spursmálið er um her ikki kundi gjørst nakað utan stórvegis nýbygging, um hesi tómu loftini, sum onga nyttu eru til, ikki kundu innrættast fyri ein ógiftan lærara, sum so kundi sovið har, haft sínar bøkur har, meðan hann fekk sín kost aðrastaðni. So hevði hann tó inuivist, at fáa mat folhr lættari. Hetta eigur kanska at havast í huga.

A. Samuelsen: Vit hava altíð vilja vist kommunum tað hensýn ikki at krevja av teimum, at tær skuldu byggja skúlahús sjálvtum forholdini talaðu fyri tí, men her er tað ein kommuna, sum sjálv vnskir tað, og so fara vit at imøtikoma vnskinum. Við hensyn til tað keðiliga í, at yvirslag og tekningar ikki eru var tað kanska vert at hugsa um, hvorvítt vit í framtíðini ikki áttu at syrgt fyri at fáa ein álitismann fyri logtingið í sovorðnum málum eins og vit hava í øðrum. Tað tykist at vera vanskuligt at fáa fatur í ein mann, sum til hvørt pákomandi tilfeldi vil pátaka sær at gera tekning og yvirslag. Tí hevði tað verið gott, um tað olfentliga helt hann og lekostaði tað: annars verður tað meira tilfeldugt. Tað er neyðugt at brúka sama framgangsmáta alla staðnis. Nógvir av teimum bygningum, sum eru gjørdir, eru vorðnir gamlir fyri tíðina soleiðis

sum hesin í Leirvík, enntó teir, um rætt hevði verið farið avstað kundu nýtst eitt sindur longur. Vit mugu leggja meiri dent á okkara skúlabygningar og helst fáa okkum ein bestemtan góðan og køuan mann sum kommununrnar og skúlastýrið kann venda sær til. Antin hetta ella nakað tilsvarandi. Eg haldi, at tað hevði verið gott bæði fyri okkum og kommununrnar, at vit høvdu ein mann, sum kundi gera hóskandi yvirslág og planir.

Prósturin: A. Samuelsen kom inn á nakað, sum vit hava haft fyri í skúlasakini í Vági. Vit hava eisini talað um har at tað hevði verið gott, um vit høvdu ein álitismann til hjálpar fyri kommununrnar og skúladirektiónina. Vit hugsa um, at bera eitt uppskot fram til tingið um hetta. Higartil hevur tað mest verið bygt tilfeldigt um tó eftir einum vissum plani. Tað kundi kanske ganga ta tíð tá skúlarnir vóru heldur smáir. Men nu er neyðugt at gera større hús og tá krevur at verða ansað eftir hvussu bygt verður. Nú má ein skilagóður maður vera at stíla fyri. Ein kann ikki krevja, at kommununrnar olla skúlastýrið skal hava tann sakkunleika, sum nýtist. Eg vil tí geva A. Samuelsen rætt í, at her er nakað, sum eigir at gerast, so at kommununrnar og skúlastýrið kunnu fáa leiðbeining. Og tá kann forstandarskapið vita, hvønn tað skal venda sær til, áðrenn slíkar sakir koma inn á tingið.

Th. M. Strøm: Á mínum plássi hava vit verið úti fyri tí sama. Lærarin í Froðba visti sær ikki innivist. Hann vendi sær so til kommunalbestýrilsi, sum svaraði honum aftur, at haun visti, hvat hann hevði givið seg til, hann visti, at eingi hús vóru til skúlan. Men teir bóðu hann royna at finna seg til rættis við lærarau á Tvøroyri, sum hevði stór hús. Eg veit ikki, hvussu vorðið bleiv, men lærarin kom tó ikki aftur. Tað er skeivt, at lærararnir ikki skulu hava hús.

S. P. úr Konoy: Viðvíkjandi teim gomlu bygningunum, sum A. Samuelsen hevur talað um, so má eg halda við honum. Hesir skúlarnir í Leirvík og Gotu eru bygdir í 1880 og kunnu ikki blíva við at standa sum teir eru. Vit kunnu ikki lætt uppføra stoinbygningar, sum eftir so stuttari tíð ikki kunnu brúkast. Tankin hjá A. Samuelsen er góður. Vit eiga at fáa ein bestemtan norm fyri, hvussu skúlabygningar skulu gerast. Í Danmark hava teir ein tílíkan ordning, sum her er talan um. Tað er kostnaðarsamt at uppføra ein skúlabygning, sum ikki stendur stórt út yvir eitt hálvt mannaminni.

Joen Poulsen: Det er rigtig, atd et, som var tidssvarende før, ikke er det længer. Børneantallet vokser stadig og Fordringerne er ogsaa større nu end de var tidligere. Engang var Lærernes Boliger lige saa gode som de, som Folk flest brugte. Men efterhaanden stilledes større Fordringer ogsaa til Boliger. Det, som engang var godt, duer ikke mere, og om nogen Tid er den gamle Plan ikke tidssvarende. Det var jo ogsaa at ønske, at Udviklingen gaar frem. Med Hensyn til at bygge to Boliger for Læreren i Lervig, saa maa Forstanderskabet raade i dette Spørgsmaal. Men der kan spørges, om det er heldigt. Naar man bygger Bolig for ugifte Lærere, saa har de yngre altid et Tilhold, hvor de kan sove og tilbringe deres Fritid. Det kniber maasko mere med Kosten. Det er byrdefuldt for en ung Lærer, at han skal selv føre Husholdning. Det synes mig at være heldigt, at man byggede saaledes, at man i Tilfælde havde let for at udvide Bygningen.

Sakin varð beind í kirkjukassanevndina.

Lántoka.

Edw. Mortensen: Jeg maatti til at stemme fyri uppskotinum, sum formaðurin setti framm

O. Effersøe: Det kunde interessere mig at vide, hvor meget man regner at skulle betale i Rente af det Laan, som her skal stilles. Saa var det Spørgsmaalet om Kreditforeningø Obligationerne. Winther mente, at vi kunde tjene paa dem. Jeg tillader mig at fremsætte det Ønske, at vi ikke skal slaa os til Ro med at haabe paa, at vi skal tjene paa disse. Vi kan ikke indlade os paa Spekulation. Vi maa sælge med det samme. Naturligvis kan vi ogsaa tjene. Men det er ikke rigtig, naar vi mener at skulle slaa ind paa Spekulationsvejen.

Formaðurin: Hvilken Rente, der bliver svaret, vil afhænge af Kursen. Af det sidste Laan blev Obligationen straks solgt og realiseret til Landmandsbanken. Det

er Meningen at gøre det ogsaa denne Gang. Jeg ser mig ikke i Stand til at besvare, hvilken Kurs der vil blive aabnet for det Laan, som nu skal optages. Jeg tror ikke, vi skal engagere Sparekassen for større og faste Laan; den er jo engageret før. Dette Laan paa 100,000 kr. skal afdrages i 20 Aar. Jeg tror derfor ikke, at det er for Sparekassen. Disse Oplysninger er dog ikke tilstrækkelige for at faa Spørgsmaalet om Kursen besvaret. Vi maa vente til der kan faas Oplysninger. For Øjeblikket er jo Telegrafkabelen til Omverdenen i Stykker. Med Hensyn til Obligationens Realisering, saa har man bemyndiget Banken at sælge til den Kurs, som kan opnaas, og vi faar da den Gevinst, som kan udvindes. Der er ikke stor Grund til at tro, at Kursen bliver lavere.

O. Effersøe: Jeg har ogsaa forudsat, at man bør sig saadan ad. Muligt er det ikke klogt for Sparekassen at engagere sig med et saa stort Beløb, som det her gælder, og at yde et saa betydeligt Laan paa saa lang Tid,, men det kunde jo tænkes, at Sparekassen kunde laane en Del af det. Jeg ønsker kun at henlede Udvalgets Opmærksomhed herpaa, men Udvalget maa selvfølgelig handle efter sit eget Skøn.

Edw. Mortensen: M. A. Winther er ikki til steðar, men eg trúgvi, eg kann siga sum hansara ætlan, eftir hvat hann hevir talað við meg, at hann hevir ongantíð hugsað sær, at vit skuldu spekulera við obligatiónunum. Men tað er jú so, at ein kann ikki realisera tær allar á sama degi, tað vil já vera obligatiónir fyri um eina hálva millión, táið bæði lánini, til Smiril og til p/f Føroyar, koma samstan; og tað er ov nógv at blaka út á marknaðin í senn. Tað má tí vera so, at tann, ið skal selja obligatiónirnar, antin tað nú verður ein vexøllerari ella landmandsbankin, hann má bíða við at selja til kursurin ein dagin er serliga góður, og hetta hevir M. A. Winther meint, og ikki at vit skulu bíða í áravís við at selja fyri at spekulera.

Uppskotinum varð samtykt.

Svimjing sum lærugrein í skúlunum.

R. Rasmussen: Her eru kommar 2 sakir inn á ting um sama mál; aðra havi eg borið fram, og skal eg siga nokur orð um tær. Tað er utanfyri tingið funnist at, at løgtingsmenn taka sær av sokum, ið koma til tingsins frá fólkinum, tað skal ikki vera serliga demokratisk. Hetta er ein sak, sum í seinastu tíðini hevir verið nógv frammi í bløðunum og sum einstakir menn hava virkað nógv fyri í teim seinastu árum. Svimjing er upptikin sum lærugrein í sumum kommunuskúlum, men ikki nóg mikið. Tað er jú so, at fáar staðni á jørðini skuldi tað verið meira neyðugt fyri hvønn mann at duga at svimja, enn her, hvar ið vit ferðast so nógv á sjónum. Men umframt at tað er umráðandi at duga henda kunstin fyri eventuelt at kunna bjarga sær úr óventaðum vanda, hevir svimjing eisini týðning, sum eitt lið í kropsvenjing og í tí, at røra kroppin, so hann mennist av tí. Her verður hitið um at fáa skúlarnar at taka sær av at fáa lært børnini at svimja. Tað er jú eisini best at læra í tí aldri og tá er mest tíð til tess. Tað er norðan úr Klaksvík, at hetta bønarbræv er komið til tingsins, undirskrivað av o. u. 28 monnum og kvinnum, og tað kundi verið eitt fleiri, verður tað upplýst. Tað er hugnaligt, at tað kemur netupp úr tí bygdini, ti har er longu nógv gjørt fyri hesum, kommunan hevir tikið sær av tí og privatmenn hava givið studning til at fáa bygdini svimjingarhyl. Umsóknin er í fleiri punktum. Fyrst biðja teir um, at løgtingið vil útvirka, at svimjingarhylur verður gjørdur fyri tey, ið ganga í barnaskúlanum, síðani um at tað verður bildið skúlaskeið fyri teim eldru lærarunum, umframt um at fáa løgtingið at stýðja kommununrnar við helft ella $^{4}/_{5}$ av útreiðslini, tá tær vilja byggja svimjingarhyljar ella brýr út í sjógvin, har tað hóskar betri og endiliga um at svimjing verður lærugrein í skúlunum (tað er longu millum tær lærugreinir, ið kunnu lærast). Táið hetta verður gjørt, má sakin sigast at vera komin væl áleiðis, og eg vil mæla tingmonnum at taka væl ímóti hesari umsókn. Eg skal bera upp á mál at hon verður beind til kirkjukassanevndina.

Joen Poulsen: Jeg gaar ud fra, at man er enig om, at Svømning har sin store Betydning for Ungdommen i Særdeleshed og Mennesker i Almindelighed, og jeg skal derfor ikke bruge mange Ord paa at anbefale Sagen i Almindelighed. Om vi faar bygget Svømmebasin for Lærerskolen, saa vil jeg anse det for meget heldigt, om de ældre Lærere kan faa Ad-

gang til et saadant Kursus, man bliver aldrig for gammel til det. Hvad angaar Tilskud til Svømmedamme, saa har Lagtinget allerede givet Tilskud til en saadan netop i den Kommune, hvorfra denne Ansøgning kommer. Angaaende Svømning som Fag i Skolerne, maa der her i Andragendet være Tale om, at man skal gaa videre end nu og indføre Svømning som tvungent Fag. Jeg kan indse, at der i Klaksvig kan gennemføres en saadan Undervisning; de har der en stor Skole med flere Lærere, og der kan blive Tid at ofre paa dette Fag; men hvis de vil tænke paa andre Pladser, ja blot paa deres nærliggende Nabosogne, f. Eks. Kalsø o. s. v., hvor hver Lærer har flere Bygder, der bliver der ikke Tid nok at anvende paa alle Fag, der er nævnt i Skoleplanen, og da maa enkelte Fag gaa forud for andre. Jeg kan derfor ikke gaa med til, at Svømning gøres til obligatorisk Fag; vi maa indskrænke os til at indføre det i Seminariet og støtte Kommunerne.

A. Samuelsen: Eisini eg skal uppá tað besta umbeðallu hesa sak, ið eg haldi hava stóra týdning, og eg skal heldur ikki siga nakað um hana í almindiligheit. Tað fyrikemur mær at tað vildi verið gott, um vit fingu at vita, hvussu lærarafelagið sær uppá hesa sak; og kundi ynskt, at vit høvdu fingið eitt áttatilsvar frá lærarafelagnum áðrenn sakin lá á tingborðinum. Her eru tvær síður við hesa sak; fyri tað fyrsta hvussu læraarnir vilja taka ímóti henni og fyri tað annað hvussu stóran studning tingið vil geva. Tað fyrsta vilja vit lættliga kunna fáa at vita, um ikki frá øðrum, so frá formanninum í lærarafelagnum. Um tað annað er at siga, at tað er mangan staðni, at tað má ofrast nógv uppá at fúa góð líkindi at svimja undir, og tá má tingið stydja kommununum. Um eg fekk lov at vísa á hvar eg haldi hendla sak rætt hoyrir heima, so er tað viktugasta hjá okkum at undirsokja, hvussu stórar peningaligan studning vit kunnu geva, og eg meini tí, at sakin kanska rættast var vist til budgetútvalgið. Tað er óivað so nógv interessa úti millum fólk fyri at fremja hesa sak, at vit fyri tað kundi tikið hana uppí lagini í teim bokentgerilsum, sum útstedaðu verða angangandi skúlarnar. Men áðrenn vit siga at svimjing skal verða tvungið fag, má tað gerast eitt stórt arbeiði frammanundan. Eg vil fyrisláa sakina henvista til budgetútvalgið.

S. P. úr Kongi: Eg gangi við, at eg eri formaður í kennarafelagnum, men eg kann harfyri ikki geva nøkrum svar, tí eg havi ikki makt at svara fyri felagið. Í alfari almodiligheit kann eg tó siga, at føroyskir lærarar óivað fara at taka væl ímóti hesum og at sakin ikki strandar uppá tað. Men í lærarafelaginum eru eisini kvinnur, og eg veit ikki, um andragarin meinar, at lærarinnur skula pliktast til at læra seg og onnur at svimja. Á teirra vegna kann eg als eingi svara. Annars vil eg siga, at vit lærarar altíð eru vanir við tá slíkar sakir koma fram, at tað so verður henvist til skúlalærarnar. Soleiðis var tá edrúligheitslógin var gjøgnumford og alkohollæra skuldi uppfakast sum tað og sama var við lógina um ikki at pína djór; hon skuldi eisini innarbeiðast í skúlunum. Lærararnir fáa hervið ikki so lítið extrarbeiði — eg vil ikki tala um alt sum nevnt er í skúlaskipanarbrotinum: havaderkan o. s. fr. Um nú svimjing eisini skal verða obligatorisk fag, so verður trongt á skúlaplanunum. Vit kunna ikki taka nakað frá tí almanna kunnleikanum, lærararnir skulu geva í skúlunum, men skal svimjingin vera utanfyri skúlatíð, so ætli eg, at lærarafelagið sigur: Jú, men so mugu vit hava lon fyri tað. Nú fáa vit at siggja í hesari tingstevnu, hvussu logtingið svar uppá, hvussu lærararnir verða lontir. Eisini eri eg í iva um svimjing skal vera obligatorisk, tað eru tó ikki øll, sum dáma líka væl at svimja, og hví skulu tey so tvingast til tað? Vit eiga ikki at gera nakað trongri fyri lærarastandin, tá tað ikki samstundis verður ávist, at vit vilja geva honum betri livikor.

Prósturin: Tá Andr. Samuelsson sigur, at kirkjukassaútvalgið fær og iljar hevur havt skúlasakir til viðgerðar, so kann eg ikki fata hetta øðrvísi enn at hesi ár eru undantøk. Eg hugsi tó at kirkjukassaútvalgið altíð hevur havt skúlasakir yvirhoyrdar til viðgerð, hetta er tí nøkrum nakað brot á gomlum tingsiði. — Eyvitað er tað gott hjá ollum at dugna at svimja, men tað er tíverri ikki alment her á landi. Eg trúgvi ikki, at tað er nakað eyðkennt fyri Føroyingar. Tað er vist yvirhoyrt so at fólk, ið livir við havið og sokir sítt arbeiði har, dugna mest at svimja. Tað kann hava sínar serligu grundir. Slíkt fólk baksar dagliga í sjónum og fær so mangan vátan karnuin; tað fellur teim tí so óvýtt at fara í sjógvin til stuttleika.

Men harfyri er tað líka neyðturviligt, at okkara fólk lærir at svimja, sjálvtmu veðurlagið og landslagið við kann virka fordandi. Júst tí krevst, at tað almenna fyrireikar og skipar fyri svimjingini, so hon ikki verður forðað av natúrviðurskiftum. Her haldi eg tað má byrjast frá í erva, við læraraskúlanum. Tey, sum skula læra frá sær nugu fáa atgongd til at lora seg sjálvi; svimjing má kunna verða lærugrein har. Og kommununar nugu bera umsorgan fyri at lætta atgongdina til svimjing, gera svimjuhyljar o. s. fr. At gera svimjingina obligatoriska í skúlanum ber ikki til, fjøldin av læraranum er ikki for fyri at læra børnini at svimja sum enn er; svimjing má vera milhum fær lærugreinir, ið *kunnu* lærast.

A. Samuelsen: Eg forstóð próstin og hin skúladirektørin soleiðis, at teir vilja sakini væl og fyri so vítt kann eg ikki ynskja hana í betri hendur. Konoy nevndi nakað um vissar treytir, sum lærarafelagið vildi stilla, og tað er einki at siga til; okkara sak verður tað so at leggja sakina soleiðis til rættis, at nakað kemur burt úr henni. Skal hon fremjast at skúlaveg, so mugu vit fara til lærararnar; tað vilja teir, ið andragandi hava sent, ivaloyst heldur ikki nokta or hin besti vegurin.

Um próstin hevði haft betri minni enn hann hevur, vildi hann minst at og ífjor upplýsti um, at vit altíð hava niðursett serlig útvalg, tá tað galt stovri skúlasakir. Tað var ikki fyrrenn ífjor, at hesin nýggi skikkurin varð innfordur, at aðalmál, skúlamum viðvíkjandi vóru koyrd í kirkjukassanevndina. Hann kann lyggja aftrí logtingsbermtninginum 1907, tá skúlalógin var fyri, síðani í 1909. Grundin var tann, at vit vildu taka hensýn til nimitalið og lata teir koma uppí útvalgini, men nakað tilsvarandi funnu teir ikki fyri gott at vísa okkum ífjor. Hesin regul er ikki eldri enn ífjor.

S. P. úr Konoy: Tað er rett, at eg og J. H. Poulsen vóru í tí nevndini. Um tað skal gerast eitt hvilt nýtt uppskot, so er tað rimiligt at velja eina nýggja nevnd, men ikki um einans ein óbetýdilig broyting skal vera gjord.

J. M. Matras: Eg vil vera við at stydja hetta andragandi tí og haldi tað hava týdning at bornini lara at svimja. Í mini bygd er tað torfort at koma til sjógvin. Kanske kundi mann gera svimjuhyl á landi. Men niðri við sjógvin er ein natúrligur dammur, sum kann brúkast, táið kyrt er. Hann er so lítil, at tað ikki er vandi fyri born at svimja har tá vaksið fólk er hjá. Men hann er nakað ringur at koma til. Vit hevdu eina lærarinnu, sum hevði lurdóm í svimjing, men í fylgju natúrins ordan hevir hon mest hildið seg til smágenturnar. Men við tað, at smágenturnar hava dugað at svimja, so hava smádreingirnir av tí sama roynt sjálvir at venja seg. Teir hava viljað kappast við smágenturnar. Tá tað hevur verið talað um studning til svimjingarhyljar, so er neydugt at fáa pongar omkurstaðnis frá. Men hvaðani, tað veit eg ikki. Alan kundi vel fáa nakað saman við frívilligt bidrag, soleiðis sum teir gjordu í Klaksvík. Síðani kundi tingið eisini givið nakað. Um man hevur lærarar, sum ikki duga at lara børnini at svimja, so kundi mann tingið aðrar til at koma til sovorðin plass um summarið til at lære bornini svimjing. Um lærararnir meina, at hetta vil minka ov mikið um lini skúlafagini, so haldi eg at tað ger minni um bornini ikke eru so nógv í skúlanum um summarið, men heldur læra at svimja.

S. P. úr Konoy: Tað ljóðar deiligt vel sum tingmaðurin á Viðareiði sigir: Vit born, farið út og svimjið. Men hvussu skal tá verða, tá prósturin kemur á oksamin. Tá hann er vel farin avstað aftur kann prosturin koma. Har kemur skúlakommissión og skúlastýrið, og ein vakran dag hevur mann ein motorbát við amtmanninum ella onkrari enn hægri myndigheit. Og allir koma teir at vita hvussu bornini duga í skúlanum. Vit kunnu ikki siggja soleiðis á hessa sak: tí vit verða strangt bedømdir, um tilstandin í skúlanum, og lon okkara verður hereftir. Tað talast um, at mann kann uppheva skúlan í Føroyum um summarið. Eg havi ikki orfaring av at skúlarnir hjá okkum eru serliga tjálgir um veturin. Tað er lítil so arbeidsligt í eini skúlastovu, tá vedrið er lott sum tað er um veturin. Allir sum vita hvussu tilgongdin er við skúlabrenslu, kunnu siga, at vit ikki verða plágaðir av hita.

J. M. Matras: Eg meinti ikki at formerum Konoy. Hann loysti av við so nógvum institusjónum, sum skuldu koma og inspicera. Teir skuldu geva lærarunum skoðs-

mál. Eg meinti, at tað skuldi vera bornini, sum teir skuldu avhoyra.

S. P. úr Konoy: Matras, sum hevur við kommunalar sakir at gera, má vita, at examia er alt.

J. M. Matras: Jeg eri ikki í kommunustýrinum.

S. P. úr Konoy: Matras hevur verið tað í mong ár.

J. M. Matras: Tá eg var í kommunustýrinum, tá hendi tað seg, at tað var examia, men ikki hvørt ár. Antmaðurin kom í teirri tíð ongantíð til Viðareiðis og próstin yvirhoyrdi ongantíð skúlabørnini.

A. Samuelsen: Tað passar ikki sum Konoy sigir, at vit ikki hava haft serliga nevnd í skúlasakum. Í 1909 kom andragandi frá Jakup Dahl um at fáa broytt lærimálið við realskúlan. Tað bleiv sent í eina nevnd av fim limum. Í 1910 kom andragandi frá Patursson um at broyta málið í realskúlanum; tað fór eisini í serliga nevnd. Eg hugsi tingmenn eru tilfriðs við hesi dømir. Tá tað vóru betýðiligir spurningar, varð serlig nevnd sett av hensýn til minnitalið.

S. P. úr Konoy: Eg havi mína meining um hví teir fáa tað í serliga nevnd. Men um teir vilja rósa sær sjálvum, so skal og eingi hava ímóti tí.

J. H. Poulsen: Vit hava brúkt tann regul at vísa sakirnar til 3 og um tað er størri sakir til 5 mannanevnd. Eg meini at hendan sak kann behandlast í 3-mannanevnd.

A. Samuelsen: Eg segði at sakirnar inntil ífjør hevdu verið behandlaðar í serligari nevnd og ikki í kirkjukassanevndini. Av hesum er hendan diskussiónin komin.

M. Samuelsen: Eg vil gera uppmerksam á tað, at tað ikki kann nytta at tala um finantsiella stytta, so leingi ikki lerarnir eru neytir at lura bornini at svimja. Annars eri eg villigur at stýðja sakina. Í mínum plássi dugir lerarin at undirvísa bornini í svimjing. Eg má halda, at tað fremsta betingilsi fyri, at ein lerari kann undirvísa væl, er at hann dugir fagið sjálvur, eg kann ikki forstanda tað orðvísi. Sum tvungið fag kann tað ikki vera tala um, men kundu vit fingið nakað av hesum í lag, vildi eg verið fegin við.

Sakin varð beind til kirkjukassanevndina.

Føroya ekonomiska status.

Edw. Mortensen: Fyri sjálvstýrisflokkin skuldi hr. M. A. Winther hava talað í dag, men hann hevir ikki kunnað koma til steðar, og eg skal tí siga nokur orð. Her fyriliggja tvinnir spurningar: 1) tann uppgjørdi roknskapur, status pr. 30. sept. 1918 og 2) yvirslag fyri útreislur og inntøkur í tí ári, vit eru í nú. Taki eg tann fyrsta, teir roknskapir, ið eru uppgjørdir, og líkni hesa statna við status frá 1917, so hevir árið, ið farið er, forbetrað status við 5,000 kr., tað kann eg ikki annað enn gleða meg yvir. Hyggur ein so uppá teir einstøku kassarnar, so er framgongd fyri sumar, afturgongd fyri aðrar, tilsaman vísa teir altso sum beint nú sagt, eina framgongd av 5,000 kr. Amtsuppartitiónsfondurin er minkaður við 10,000 kr., orsøkin er tann, at løgtingið hevir kostað millum 8 og 9,000 kr. meira enn annars, men hetta skyldast einari løgtingssamtykt, sum bæði sjálvstýrismenn og sambandsmenn góvu atkvøðu. Økonomisk fond er minkaður 6,000 kr., hann hevir havt minkaðar inntøkur, eingin hvalatollur hevir verið, og hevir haft útreiðslur uppá 2,000 kr. til lærarapensiónir o. s. fr. So eru aðrir kassar og fyritøkur, ið vísa framgongd; telefonin hevir eina framgongd at vísa til uppá 15,000 kr.

Eg skal ikki siga meira herum nú. Hin spurningur er, hvørjar pengar vit hava at ráða yvir. Her má eg halda fram, hvat frá okkara síðu er hildið oftu fram fyrr, at vit hava nógv ov lítlan pening at ráða yvir, og tað má skjótast gjørligt komu til tess, at vit fremja tað punkt í sjálvstýris programminum, ið sigir, at vit mega útvega løgtingi størri inntøkur á lagaligan hátt, og vit eru ógvuliga forhaarmaðir um, at vit enn ikki hava fingið framt tann skattalóg, vit samtykktu ífjor, og sum nevndin vildi hava útvegað okkum størri inntøkur á ein lagaligan hátt. Tað kann hvør maður nú siggja, at hev peningaligu krav, ið gerast uppá løgtingið, vaxa ár undan ári; ein talari nevndi áðni stuðning til byggingar av svimjingarhyljum; tað krevst

av tinginum studningur til hópin av fyritøkum, ið skulu gerast, um framstig skal vera her á landi. Hvat disponera so hesir kassar yvir? Tað verður heilt lítið. Økonomisk fond disponerar yvir o. u. 6,000 kr., amtsfattigkassen yvir o. u. 4,000 kr. So er tað telefonin, han disponerar yvir o. u. 10,000 kr., men tað er bundið til eitt vist endamál. Ja, so hava vit ikki stórt annað at ráða yvir, utan hvat vit kunnu fáa úr amtsrepartitiónsfondinum; og vit eru klárir yvir, at vit í ár mega líkna nakað væl aftrat uppá til amtsrepartitiónsfondin, um vit skulu hava nógmikið til okkara útreislur. Nú koma vit til útreislurnar. Har eru fyrst útreislurnar til løgtingið, tær eru meir enn 8,000 kr. størri enn fyrr, og tær vilja ikki minka, so har mega vit altso líkna uppá. Aðrar útreislur eru, sum mega dekkast, við láni; til vegabyggingar er goldið úr amtsrepartitiónsfondinum 21,000 kr.; til vegabyggingar er samtykt at taka eitt lán uppá 100,000 kr., men so kemur spurningurin um rentur og avdrag; og tað er ein støðulig útreisla. sum er páført løgtingi, tá hitt núverandi minnitalið var fleirtal, og tað er tí at vænta, at teir verða samsintir við okkum í at skaffa dekning. So eru lánini til Smiril og til lutapeningin í l/f. Førovar; tey skulu eisini rentast og avdragast. Hvat ið Smirli viðvíkir, vil eg mæla til, at vit einki líkna uppá, tí um Smiril verður administreraður væl, má hann renta seg sjálvur, í hvussu er hetta fyrsta árið, tá tað er sikkurt, at hann vil hava fulla last, til hvønn túr. Heldur ikki haldi eg okkum nýtist at líkna uppá til lutapeningin í l/f. Førovar, tí eg gangi út frá, at tað verður ein góð fyritoka, ið vil geva tinginum ríkiliga dekning. Táið minnitalið eisini, undantikið nokrum fáum limum, hevir princippielt áttalað seg fyri, at løgtingið tók part í hesum felagi, mega teir hava sað hetta fyri eina rentabla fyritoku. Vit mugu altso líkna uppá til sumar av okkara útreislur og lána til aðrar. So er spurningurin um sanatoriið, hvussu skal vera við tí, ja, har má tingið eisini geva studning, men tað verður umrátt í sanatoriinevndini. Í økonomisk fond eru 6,000 kr., um vit fáar nakrar inntokur til hansara næsta ár er óvist, og vil ikki vera, utan stórhvalaveiðan kemur aftur í lag; har er ætlað ein inntoka uppá 4,000 kr. Mín hugsan er, at vit mega tí til sumar útroislur líkna uppá til amtsrepartitiónsfonulin, hvussu nógv má tiggjarnevndin áseta. Eg skal taka upp aftur, at status pr. 30. sept. 1918 er 5,000 kr. betri enn árið framanundan.

A. Samuelsen: Fleirtalsorðførarin begynnir og undar við at siga, at statns er 5,000 kr. betri enn árið frammanundan. Tingmaðurin Mortensen er, sum hann sjálvur segði frá, bert tiltaksorðførari í hesari sak, og tað var gott, at hann segði frá tí, tí tað er annars klárt fyri hvørjum tingmanni, ið byggur væl eftir rokuskapinum, at status er onganhvnda 5,000 kr. betri. Um Edw. Mortonsen vil lesa bemerkningina, ið stendur niðri undir amtsrepartitiónsfondins status, so framgongur harav, at í aktivnum er innbefattað 23,500 kr., sum eru betaltar av statskassanum sum forskot til dýrtíðarhjálp. Hetta má trekkjast frá, og so verður balancan 11,360 kr. verri enn seinasta ár. Tá tey 23,500 fara frá, so siggja vit, at tað ikki er framgongd, men at vit eru farin nógv túsund tilbakur. Eg vil spyrja hr. Mortensen, um hetta ikki er rætt. So vil eg ganga yvir til at tosa um yvirsiktina tár og halda hana saman við tað frá ífjør. Eitt hitt fyrsta her fellur í eyguni, er at í status-yvirsiktini pr. 30/9 1918 ikki er meðtaget Udgifterne til Trykning af Lagtingstidende. Tá tingmaðurin Mortensen sigur, at løgtingið ífjør hevur kostað 8,000 kr. meir enn árini frammanundan, so eigur hann til hetta boløb at leggja tær 10—12,000 kr. sum løgtingstíðindið ivaloyst kostar. Í mótsetning til hvat fyrr hevur verið galdandi fyri amtsrepartitiónsyvirslagið er tað seinasta ár yvirskriðið í tann máta, at tað av rættum kann sigast, at allar rammur eru sprongdar. Pálíkningurin, vit viðtóku ífjør, hóskar ikki til tær virkuligu útgiftirnar, hann svarar ikki til tær útgiftir, løgtingið hevur pedrágið løgtinginum í hesi sesongini — um eg so má siga. Faktisk átti at verið páliknað meir enn tvarreisur meira enn ífjor. Tað var sagt, at løgtingið hevur kostað 10,000 kr. hetta árið, tað fyrikemur mer, at tað hevur kostað einar 26—27,000 kr., tá vit taka løgtingstíðindi við. Útgiftirnar til landbrúkið eru farnar betýðiligt upp; her er longu útbetalt 5,000 kr. og sum tingmenn siga er meira í vanlin. So eru rentur og avdrag eisini farið upp. Til elektricitetsundirsokilsir er útbetalt 3,000 kr., men hetta talið má ivaloyst multiplicerast nakrar ferðir enn. Eg havi í hvussu er uppá fólisi, at allir hesir ingeniorar, vit hava gangandi her, skulu hava nakað nógv í lon. Tað er ógviliga óheldugt, at tann

maður, vit hava anntikið, ikki interessorar seg sunnikið fyri tí síðuna av sakini, at hann hevur spurt, hvat tað kostar, og eru meira kediligt er tað, at viðkomandi løgtingsmaður, sum hevur staðið fyri hesum, ikki hevur hugsað um at spyrja um slíkt. Vit aðrir noyðast tíverri at taka hensýn til nakað so smátt sum umkostuningarnar. Eg kann heldur ikki vera einigur við tingmann Mortensen um at hoða lánini, ið uppteikin eru til skipakeyp, hava verið neyðvendug, og navnliga ikki um at tey ikki skulu vera uppførd á yvirsiktina. Vit vita jú ikki petti um, hvussu vitt »Smiril« fer at vera eitt gott aktiv; eftir teimum erfaringum, vit hava hogartil, sýnist hann ikki at skula geva serligar stórar inntøkur. Rentur og avdrag skuhi í hvussu er betalast og kreditorarnir vilja neppa nojast við, at vit henvisa til tað góða aktivið. Hann gav ikki yvirskot, tá hann var drivin av einum komum selskapi, enn minni nan hann fara og gera tað nú hann verður leiddur av antmannunum og varanevndini, sjálvt um formaðurin har er nógso útmerkaður. Tað sama geldur hitt stóra lánið til innskot í partafelagimum dampskipaselskapinum »Føroyar«. Heldur ikki her lora vit at væntа stórar inntøkur í komandi ári: tað kann lætt henda seg, at vit einki skip hava fingið, tá árið er farið, og so leingi sum einki skip er gevur tað ongar inntøkur. Rentur og avdrag til hesi hoðni skipakeypini eru 26.700 kr. Hetta er gott og væl so nógv sum heili antsrepartitiónsfondspálíkningurin var ífjor. »Smiril« vóru vit einigir um at keypa: ganska vist var tað keðiligt, at hann bleiv so dýrur, men har var jú einki at gera við. Dorímóti er tað ikki rætt tá tingmaður Mortensen leit forstanda, at minnitalið har í tinginum hevði verið einugt við floirtalið um, at løgtingið skuldi skjóta 350,000 kr. inn í partafelagið dampskips selskapið »Føroyar«. Tað var ikki eingang viðtikið av øllum sjálvstýrismonnum - - sovítt eg minnist var tað ikki meir enn 11, sum stemmadu fyri tí. Prinsipielt hevdu vit tó einki imóti tí, vit fyrislógu tað bara ítsett til komandi Ólavsoku. Vit vóru imóti at keypa skip á einum tíðarpunkti, tá oll líkindi vóru fyri at vit máttu tapa uppá tað. Teir menn, sum hava ansvarið fyri tí eru pliktadir at syrgja fyri, at tað verður líknað 27,000 kr. til rentu og avdrátt til skipakeypið. Mortensen helt, at aktiefelagið vildi bliva okkum eitt gott aktiv. Tað kann vel verða ymist. Eg haldi, at skunda vit okkum ikki at fáa skipið so verður tað ikki vert meir enn helvtina av tí tað er keypt fyri. Heila verðin hopar jú uppá, at fraktirnar skulu falla, og eisini virði av skipum falla. Vit mugu kanske nú líkna 3 -4 ferðir so nógv til amtsrepartitiónsfondin sum ífjor. Um framá tað. hava vit brúkt tann beholdning vit áttu í byrjan av árinum. Vit hava lán av 43,000 kr. síðani ífjor. Havav er gingið 21,000 kr. til vegir. Men til almindeliga útgiftir eru brúktar 20,000 kr. Viðvíkjandi økonomisk fond er har ikki so nógvir pengar at bevilga. Har er status góður. Grundfondið er 26,000 kr., sum eru spardar saman. Beholdningurin í 1918 er 16,000 kr. Og tað væntast, at hann 30 septbr. 1919 kann bliva 11,000 kr. Vit hava rentuinntøku av 13,000 kr. Men hvalaveiðuavgiftin er óviss, vit vøntuðu, at hvalaveiða kom aftur at ganga fyri seg her í ár. Men tað varð ikki. Men hvalavoiðunevnirnir koma tó vist aftur einaferð. Viðvikjandi amtsfattigkassan, so eru vist tær vesentligastu inntøkurnar rentur. Har er grundfondið 36,000. Tað er nakað í hosi yvirsiktini, nakað, sum og ikki skilji. Tað stendur: »Den formodede Balance«; men tað er kanske ein teykkfeilur. Í skjútskassanum eru eisini pengar. Men skjútskassaútgiftirnar ganga upp aftur. Líkningin noyðist tí at bliva meiri. Tó er har ein beholdningur av 9.000 kr. Annars skal eg siga um skjútskassan, at hann hevur latið 700 kr. til telefonina. Nú tað gongur væl við telefonini, haldi eg at hetta kann detta burtur. Viðvikjandi sanatoriinum vísir tað seg, at driftin ikki kann svara seg. Tað má tí umhugsast hvussu skipast skal við undirskotinum. Telefonverkið hevur givið okkum yvirskot av 20,000 kr., og tað sæst, at bulansan er 15,000 kr. betri enn árið framman undan. Tað er glediligt. Tað stillar seg eisini storri forventningar frá okkara fólki um at tey bokýðiligi útviðilsini nú skulu koma á gongd. Tað eru eisini onnur krov, sum eru reist. Vit hava soleiðis nú til viðgerð eina sok um svinjing. Tað er ein fiantsiel sok, sum og vildi vaskt kom í bindgetnevndina, tí har hoyrir hon til. Aðrir vilja hava hana í kirkjukassanevndina; men tað er spurningur um kirkjukassin, sum ikki hevur nógvan pening, kann klára hana. Heldur ikki í aðrar mátar hoyrir sakin hugar. Mortensen meinti, at status í eygaldlikkinum manar okkum til at skaffa storri inntøkur. Hetta er

roti, um vit ikki halda útgiftirnar smærri. Hann helt, at tað var skeivt, at vit ikki fingu skattalógina igjøgnum. Hann meinti, at skattareglurnar í henni vóru betri enn í amtsrepartitiónsfonden. Men okkara nú verandi skattareglur fyri amtrepartitiónsfondin eru so góðar, at tað er ein spurningur, um onnur kann fáa betri reglur. Her er skatturin gjøgnum kommmunurnar útskrivaður eftir formúgu og leiligheit. Tað er vist tað mest ideella. Status hjá okkum í stundini er rætt beteinkiligur. Árini frammanundan hava vit greitt okkum við smáum utreiðslum, meðan vit nú eru vissir í, at tær vera stórar. Skattalógin kann vera góð, um nógv er at taka inn. Kannske tað kunnu skaffast nakað nógvir pengar, men tað er jú eisini hrúk fyri teimum í kommununum. Men tær útreiðslur, sum fleirtalið hevur pádrigið amtsrepartitiónsfonden, tær verða standandi tá skattaevnini einaferð verða minni góð. Tað er fleirtalið her í salinum, sum hevur tikið bestemmilsi um at leggja større byrður á løgtingið. Men so skulu teir eisini sýna hvar vit skulu taka inntøkurnar frá. Og so vil eg siga: Lat okkum syrgja fyri, at Føroya fólk skal fáa at vita, at vit hava pádrigið okkum útreiðslur. Lat okkum ikki krógva fyri Føroyingum, at vit hava pádrigið okkum oin stóran hóp av jeongum til keyp av »Smirli« og av tí nýggja farmaskipinum. Vit krevja, at tað verður pálíknað, men vit samhandsmenn fráleggja okkum annsvarið. »Smirli« hava vit verið við til. Hitt hava vit ikki verið við til, og vit vilja forklára frá okkara stoðu, netupp fyri at teir føroysku veljarar kunnu vita, hvat teir hava at vænta. Her skal einki stingast undir stólin.

Edw. Mortensen: Her er ikki tala um at stinga nakað undir stólin. Tá tann seinasti talarin helt, at tað var neyðsynt at líkna so og so nógv uppá fyri at dekka útroislurnar til keyp av Smirli og til hitapening í l/f. Føroyar, so skal eg siga hartil: Vit líkna einki til telefonina; tað er ein institutión undir løgtinginum, ið klárar seg sjálv. Á sama hátt við Smirli, tað verður ein drift undir tinginum, ið vit mega royna at fáa til at svara seg. Eg veit ikki, um A. Samuelsen trýr, at Smiril ikki vil svara seg, oftirhvat ið og kemur til driftina, haldi eg tað vera ómuguligt annað enn at Smiril, ið fer at sigla við fullari last, hvønn túr í hesum ári, má geva yvirskot í hesum rokningsári. Viðvíkjandi dampskipafelagnum kundi eg betri gingið við til, hvat A. Samuelsen segði, tí skipið fer ikki at sigla fyrr enn næsta ár, og tær rentur, ið skulu gjaldast í ár av lánunum, kundu vit jú fingið inn við at líkna. Men vit hava jú ongar obligatiónir tikið onn, og eg venti altso, at fyritøkan fer at svara seg og gera tað óneyðugt fyri okkum at líkna til hetta endamál. Táið sambandsmenn góvu uppskot um at tingið skuldi taka part í lutapeningunum við 350,000 kr., so mátti tað vera, tí teir trúðu uppá fyritøkuna. Teir vildu lata tingið taka lutapening fyri 350,000 kr. táið líka nógv var teknað av fólkinum; teir vistu, at teknað var fyri 300,000 kr., og hitt ið restaði mátti vera lætt at fáa aftrat, so loirna tilboð mátti vera givið, tí teir hava trúð, at hetta fór at gauga væl. A. Samuelsen kann ikki koma í dag og siga, at sambandsmenn ikki hava haft hesa trúgv; tað var kanska bert sýslumaður Samuelsen og ein maður aftrat, ið sóu myrkt uppá hetta, allir hinir sambandsmenn stóðu saman um at styðja sakina. Sýslumaður Samuelsen sigir, at tær 23,000 kr., sum statscin hevir givið í forskot til dýrtíðarhjálp, ikki eiga at vera uppførdar sum aktiv. Ja, tær áttu ikki at vera settar undir amtsrepartitiónsfondinum, men eg gangi út frá, at statua er beinur, og so má nitt sovorðið forskot, um tað er uppført sum aktiv, eisini vera uppført sum passiv, og so kemur tað út uppá eitt. Annars haldi eg, at hetta er einki at trætast um, hatta beløpið (5000 kr.) er so lítið at hefta seg við. A. Samuelsen fanst at, at prenting av løgtingstíðindi ikki var tikið við í statusyvirlitinum; tað kann tað ikki vera, tí tað er ikki prentað fyrr enn aftan á 30. septembur. So spyr hann, hví amtskommunan hevir neyðst at upptaka lán. Vit hava haft stórar útbetalingar, 20,000 til vegir og annað til telefonir. Hesar útreislur mega fyri ein part takast við láni. Eg eri ikki bangin fyri at líkna meira, og eg eri vissur í, at Føroya fólk vel er fort fyri at lata meiri skatt. Føroyingar hetala í skatt til amtsrepartitiónsfondin 25,000 kr.; táið teir aleina fyri at nýta telefonina hetala 60,000 kr verður skatturin uppá 25,000 kr. fyri einki at rokna. A. Samuelsen tosar um, at vit skulu ikki krógva nakað; ja, samhandsmenn hava altíð roynt at ræða fólk frá sjálvstýrinum, og nú siga teir: hygg, har koma teir við ollum hesum stóru útreislunum til svimjingarhylj ar o. s. fr.

Men eg ori ikki bangin fyri at leggja meiri skatt á Føroyingar, tá ið hann væl at merkja verður lagdur rættferdiga og eftir vaxandi skala, so teir koma at betala, ið hava ráð til tess, og táið so Føroyingar fáa nakað gjørt fyri peningin. Tann lógin, vit gjørdu ífjør um hetta mál, var góð, og tað haldi eg fast uppá, tað er tí, at hon ikki var tjenlig, at ministeriið hevir sent hana aftur; hon var gjørd eftir teim núgaldandi donsku og íslendsku skattalógum. Eg meini, at vit við tí lógini hevdu fingið nógvan pening til tingið, í normalum árum o. u. 75,000 kr., og teimum hava vit hurðliga brúk fyri. Amtsrepartitiónsfondslíkningin er ikki góð. Lat okkum siga, at vit skulu brúka eitt ella annað beløp og vilja taka við líkning. So skulu vit til at ætla hvussu nógv Klaksvíkskommunna er verd, hvussu nógv Haldórsvíks kommuna er verd o. s. fr., alt uppá gjøt. Amtsrepartitiónsfondsskatturin er ikki bert ein skattur uppá formúgu og leilighed, sum A. Samuelsen segði, men eisini ein jarðaskattur. Hvørja ferð vit skulu hækka skattin á inntøku, skulu vit eftir lógini eisini hækka skattin á jarðagóðsinum, og tó at eg einki havi ímóti at skatta jørðina eins væl og aðra inntøku, so eru inntøkurnar av jørð í Føroyum ikki so stórar, at tær fylgjast við øðrum inntøkum. A. Samuelsen roynir at seta sína orð fram soleiðis, at nú eru so stórar útreislur, og tí skal Føroya fólk ræðast. Tað var nevnt, at 3 verkfrøðingar ferðast um oyggjarnar og grannska moguligheitirnar fyri elektriciteetsverkum, tað man ikki vera nakað, man kann ræða fólk við longur, kann nakað gott koma burtur úr hesum, vil fólkið óivað vera fegið við at lata tann pening, hetta kostar. Her eru nógvar sakir, ið kosta pening, elektriciteetssakin, Smiril, danskipafelagið o. s. fr., men hetta eru góðar sakir, tær vilja geva framstig og fyritøkurnar vilja sjálvar bera útreislurnar.

A. Samuelsen: Orðforarin forsvaraði seg við, at hann hevði ikki lagt til merkis, at status var gingin tilbaka, tí ein postur var komin undir amtsrepartitiónsfondin, ið ikki hoyrdi til har, og hann segði, at var hesin postur fardur til inntøku, var hann væl eisini fardur til útreishu. Eg havi ikki gjørt nakað nummar úbav tí, at status er gingin tilbakar við 18,000 kr., men tað gjordi orðforarin, tá hann fortaldi, at status var gingin framm við 5,000 kr., hvat altso ikki er rætt. Man má tó taka hønsýn til eina so vesentliga útgift sum logtingsbíðandi, sjálvt um tað ikki er uppført á yvirsiktini. Orðforarin tosaði nakað um 13—15,000 kr. til sanatoriið; eg vildi gjarna spurt formannin í sanatoriinevndini, um amtsrepartitiónsfondin hevur givið nakað tilskot til sanatoriið. Tað kundi sjálvsagt verið grund til tað, men her er einki nevnt í so máta. Her stendur bara at sanatoriið skyldar ein hóp til bankan pr. 30. decbr. 1918. Men hetta er kanska nakað, sum helst má dyljast. So framkom orðforarin við einum bemerkningi um, at Føroyafólk nokk vildu betala. Ja tað eru tey jú noydd til. Men táið hann páberópar seg, at fólk brúka so og so nógv til telefonering, so kunnu tey saktans hatala sannlíkan skatt, tá fyrikemur tað mær at vera ein merkiligur logikkur. Tað skal ikki undra meg, um orðforarin í næsta umgangi sigur, at Føroyafólk brúkar 5 milliónir um árið at liva fyri — ergo kann tað skatta í forhold hartil. Eg kviði fyri, at hetta fer at duga sum argument yvirfyri fólki yvirhovur. Faktum er jú tað, at ongantíð maður í hesari tíðini noyðist at brúka meir enn hann fortjenar og altso livir uppá skuld. Eg sigi ikki tingmanninum Mortensen illa fyri tað at hann hevur gjørt sítt arbeiði illa, fyri tað at hann ífjør ikki prestaraði tað besta. Men ministeriið sigur ganska víst, at hansara útkast til eina skattalóg ikki egnar seg til at fremja, og eftirsum tað er ein maður, hann haldur nógv av, umtá ein studiekammeratur av hønum, sum hetta sigur, mugu vit væl trúgva tí. Hr. Mortensen meinar, at hansara skattalóg vildi givið logtinginum 75,000 kr. í inntøku, tað kann hann ikki hava minsti meining um. Líka fitlan rætt hevur hann til at siga, at líkningurin til amtsrepartitiónsfondið er fyritikin uppá gjøt; tað er hann aldeilis ikki. Ein stórur partur verður ganska víst líknaður eftir skjønn, men ikki uppá gjøt. Vit, sum líkna, kenna so nøkulhundra skattaevnirnar í kommununum. Líkningin hevur hegnartil verið pálitalig og rætt góð. Eg forstandi meg ikki uppá, at hr. Mortensen í ár er so ógviliga evnaur um jarðagóðsið, at tað ikki má fáa meira skatt. Tað hevur ikki haft tey bestu líkindi íár, men tá ein kortini minnist til, hvat ið sagt var ífjør av Mortensens monnum, tá teir kravdu, at jarðabrúkararnir ikki aleina skuldu betala skatt, men láta ein stóran part av sínum inntøkum aftrat, so falar mann ikki so gott hesa ovmetnheitina. Tað er aldeilis ikki so, at vit ræðu fólk við skattum, men vit vilja

lata fólk vita, at tað kostar, tað, sum gerast skal, og hvat tað kostar. Vit vilja eisini lata Føroyingar vita, at tað er dýrt, táið vit skulu fara og spæla statur; herfyri hevur løgtingið ikki tikið sær annað uppá enn tað, sum hoyrir innundir eina amtskommunu.

Edw. Mortensen: Teodensurin í Andrass Sámalssons talu er skiliga tann, at Føroyingar ikki hava ráð at betala meir enn tær 25,000 kr., teir nú lata til amtsrepartitiónsfondina. Kortini er væl hann einugur við okkum øllum um, at nógvar av teimum uppgávum, her liggja fyri, eru løgtingssakir, sum løgtingið eigur at styðja. Føroyingar betala í inntøku skatt til løgtingið 1 kr. uppá mannin. Í Danmark er statsskatturin 10 kr. uppá fólkið, umframt tann ekstraskatt, kríggstíðin hevur ført við sær — o. u. 200 kr. pr. høvd. Eg hugsi ikki nakar vil siga tað, at ein føroyskur maður yvirhøvur er 10 ferðir verri staddur, hevur 10 ferðir verri ráð enn ein maður í Danmark. Tann normali skatturin í Danmark á fólkinum er 10 kr. yvirhøvur. Vit betala einki til statin, og bara 1 kr. til løgtingið. Vit eru tó væl ikki 10 ferðir ringari enn ein almindiligur maður í Danmark. Um vit skuldu goldið 5 kr. yvirhøvur, so koma vit upp í 100,000 kr. Tað er tí ein skeiv hugsan, at Føroyafólk ikki kann styðja nakra av teim uppgávum, sum løgtingið átti at framt. Tá eg havi hildið fram, at status frá 1918 er 5,000 kr. betur enn árið frammanundan, hvat rokn-skapið útvísir um hr. Samuelsen nokk so nógv vil siga harímóti, so havi eg vilja konstatera, at status er umtrent sum hann var í 1917. Tað er soloiðis einki í ti, at fleirtalið skal hava brúkt so nógvar pengar, at løgtingið er við at fara á húsagang. Pr. $^{30}/_{9}$ 1918 er so at siga tann sami status sum í árinum frammanundan. Tá vit umtala útreiðslurnar í tí komandi roknskapsári, má havast í huga, hvat tað nú kostar at prenta løgtingstíðindi. Hesar útreiðslur koma á tann næsta status. A. Samuelsen sigir, at hetta kostar tinginum 10—12,000 kr. Formaðurin fyri nevndini — R. Rasmussen — sum hevur við hesa sak at gera, sigir, at tað kostar 3,000 kr. Um tað kostar nakrar túsund krónur meiri ella minni, so meini eg, at tað er eitt stórt framstig, ið her er gjørt. Tað kemur eisini ann uppá, hvussu nógvar av hesum bókum, ið soldar vera. Kanske at øll tey 1,000 eksemplarini verða seld, um ikki nú so so við og við. Tað, sum og serliga vildi halda fram, tað var, at Føroya fólk hevur ráð til at betala nógv meir fyri at løgtingið kann fremja uppgávur, sum kunnu verða til gagn fyri okkara fólk og land.

Nyholm Debess: A. Samuelsen setur tann spurning til orðferaran í sanatoriinevndini, um tað frá amtsrepartitiónsfondin er goldin meiri peningur til sanatoriið í 1918 enn í 1917. Eg kann ikki í stundini geva eitt bestemt tal; menn hetta tilskotið hevur verið størri í 1918 enn í 1917. Um A. Samuelsen vil hava bestemt tøl, so kunnu tey skaffast, til sanatoriissakin aftur kemur framum her. Tey tølini vilja tá vísa, at hesar útreiðslur hava verið størri í 1918 enn í 1917. Annars veit jú A. Samuelsen, at tað ikki er so nógv nevndin, men bókhaldarin, sum hevur við hetta at gera.

S. P. úr Kongi: A. Samuelsen rósar tí skattamáta, sum brúkast í Føroyum. Hann meinar, at skatturin eftir formúgu og leiligheit er ein góður máti. Eg kann ikki skilja, at menn sum hava erfaring hendan vegin skuhi rósa, at forstandarskapini skulu kunna líkna skatt eftir formúgu og leiligheit uttan at nýta skattaprocent. Tað er ógviliga vanskiligt at fáa at vita, um mann hevur líknað rættan skatt um hann sum verður skattaður vil dylja. Eg veit ikki, um A. Samuelsen hevur roynt av at líkna skatt. Menn um hann situr í forstandarskapinum, vildi hann ikki rósa tí mátanum, sum er at líkna skatt eftir skjønn. Tað sæst, at tingið í sini tíð hevur anerkent, at hesin mátin er skeivur. Tingið gjordi eina viðtøku um hetta í 1905, men hon bleiv tó ikki útført í lívið. Men einaferð má ein annar skattamáti koma.

A. Samuelsen: Orðforarin fyri fleirtalinum helt at tingið hevði so lítlan skatt frá Foroya fólki. Her var ikki størri skattur enn 1 kr. uppá hvønn mann. Hann meinti, at mann kundi ganga upp til 5 kr. Eg vil lata hetta standa sum tað er og skal ikki træta um tað. Tað má Foroya fólk um. Eg havi ikki hoyrt, at tingið er falitt. Men er tað so, tá er skuldin hjá sjálvstýrinum. Statusyvirlitið 1918 vísir hvussu sjálvstýrið hevur regurað. Mortensen sigir, at referatið ikki kann koma við fyrr enn á næsta roknskaparári. Men status fyri 1919 vil vísa, at ikki eina líknaingin verður sett upp, men at eisini beholdningurin, sum vit hava spart, verður brúktur. Hvat vit so hava fingið aftur fyri kunnu ymiskar

meiningar vera um. So sigir Mortenson, at eg havi sagt, at tinguppritið kostar so og so nógv. Eg hugsi ikki, at formaðurin fyri referatnevndini vil kavera at tað ikki kostar meir enn 3,000 kr. Og útreiðslurnar av sakuppritinum slaulu vael eisini roknast uppí. Eg eri keddur yvir, at R. Rasmussen hevur sagt 3000 kr.; tí hann mann fars at vera narraður í hesum. Mortensen sigir, at kanuske vit kunnu selja alt sum prentað er. Kanuske. Men eg havi roknað við, at ikki øll tey 500 expl., sum eru bílagd, verða bolalt. Eg vænti, at undirskotið av tí munnliga tingreferatinum verður meir enn 3000 kr. Eg vænti, at undirskotið uppá tað munnliga referatið verður meir enn 3000 kr. Tað svar, sum eg fekk frá formanninum í sanatoriinevndini var ikki skikkað til at gera meg klókari; hann segði til ondan, at bókhaldarin viati betri boskeð enn hann, tað hopi eg eisini, annars fáa vit einki at vita um standin. Tað framgongur av statusyvirlitinum, at amtsrepartitiónsfondin hevir avbildið rentur og avdrag síðani 1908. Tað steudur á síðu 19, at hetta hevir verið millum 6 og 7000 kr. árliga. Nú kundi eg vnskt at fingið at vita, um amtsrepartitiónsfondin hevir betalt undirskotið av sanatoriinum; tað var sagt, at hann hevir betalt hesar 15,900 kr., men tað ljóðar mær nakað ótrúliga, tí so mátti tað sæst á roknskapinum fyri fondin, og har finni eg einki harum. Umframt hasar 15,900 kr. skuldu vit fyri sanatoriið eftir status skylda 7,000 til Føro Amts Fattigkasse og 13,800 til Foroya Banka, og tað haldi og vera forferdiliga nógv at skylda. Eg hugsi, at nu vit hovdu haft bókhaldaran her, so hevði hann sagt okkum, at av hesum postum var einki betalt. Konoy talaði nu hvussu vanskudigt tað var at likna skatt eftir teim núgaldandi reglum, og at tað var eitt álvarsamt arboiði. Tað seinasta haldi eg eisini, men eg kann ikki vera samsintur við honum í tí fyrsta. Eg trúgvi, at tá kommunustýrini fáa ta nýggju lóg til gjognumsýn, vilja tey óivað halda tað vera eina álvarsama sak, men eg trúgvi, at har verður nóg so flokt hjá teimum at finna út av ollum teim bestenmilsum har eru. Eg havi róst tann gamla mátan at skatta á, eftir skjon, og eg meini, at tað er ein góður máti, tá ein dugir at anvenda skjon. Eg trúgvi, at kommunustýrini vita sogott boskeð, at tey kunnu leggja skattin, har hann eigir at vera. Við tí skattalóg, sum sjálvstýrisnevnd kom við ífjor, vilja nógvir spurningar vera líka so vanskiligir sum nú undir hesi lógini, tá vit hava skjon. Vit hava einki so ógviligt ímóti at fáa eitt nýtt skattasystem, men vit ynskta at kunna seuda lógina til kommununar til gjognumsýn, so vit fingu at vita, hvussu tær stillaðu seg til hetta. Eg skal siga, áðrenn eg slutti, at vit stemmaðu ikki fyri lógini, og vit hava onga skyld í, at hon ikki er framd.

Formaðurin: Der er ikke af Amtsrepartitionsfonden afholdt nogen Udgifter til Dækning af det Beløb, Hr. Mortensen nævnte, vedrørende Sanatoriet.

R. Rasmussen: A. Samuelsen vil halda, at tað tal, sum eg havi fingið fram at lagtingstíðindi hevir kostað, ikki passar. Fyrst vil eg siga, at hetta tal ikki er, hvat tað vil kosta næsta ár, tí vil tað ætlandi vera biligari. Hetta hevir kostað 4,926 kr. í løn til referentar, dietir, korrektur, fyri at savna haldarar, til pappir og prenting, og havi tikið ivaloyst við í yvirslagnum og pappírspurisurin er eitt sindur roknaður hægri enn eigir at verða. Haldarar eru 524; teir hava skrivað seg fyri hetta fyri 4 kr. A. Samalsson trýr ikki, at teir vilja betala, og trúgvi ikki, at Førovingar soleiðis yvirhøvur leypa frá teirra forpliktilsum, og hesir hava skrivað seg sum haldarar. Undirskotið verður 2,830 kr., og tað skal nokk passa. At sjálvt logtingsarboiðið er verðið dýrari síðani sjálvstýrið fekk fleirtal, kann vera; men er tað verðið dýrari, skal A. Samalsson eiga sin stóra part av skuldini, tí vel hava vit haft stórar og umráðandi sakir, men nan kann í stórum treatast um viktugheitina av tí, ið er sagt her á tingi, ikki minst av honum.

O. Effersøe: Der var for Tale om Tendens. Jeg synes, at Flertallets Ordfører har en altfor udpræget Tendens til at skyde Ansvaret fra sig og sit Parti og lægge det paa Mindretallet. Naar man erindrer, hvorledes den tidligere Ordfører for Flertallet, Hr. J. Paburason, altid fremhævede, at Ansvaret laa hos Flertallet, maa dette forekomme os at være aldeles upassende for det nuværende Flertal (det tidligere Mindretal) at skyde Ansvaret over paa os, der er i Mindretal. Da vi havde en lille Guld, da bortu vi i Overmaal, hvorledes vi havde pantsat Færøerne og mineret dem o. s. v. Hvor er de 4 Millioner? omtrent saaledes lød Ordene. Her har været

altfor megen Agitation, og det skyldes Flertallet. Naar vi ikke har kunnet mødes mere i de økonomiske Spørgsmaal, skyldes dette den spændte Situation vedrørende de statsretlige og nationale Forhold. Der har været, synes jeg, en altfor stor Tilbøjelighed til at kaste Ansvaret for alt muligt, for enhver Fremgang eller Tilbagegang, over paa Lagtinget. Vi bør dog i nogen Grad lægge Ansvaret paa private eller paa Kommunerne. Vi maa tillige henvise til privat Initiativ, til kommunalt Initiativ og desuden til Statskassen. Vi maa være forsigtige paa det økonomiske Omraade; Krigsfortjenesten begynder at glide nedad, og man er blevet flot anlagt. Vor Hovednæringsvej er jo Fiskeriet, og det kan man vente vil blive højst svingende. Det kan forholdsvis kortligt give meget mindre Indtægter, ogsaa Landbrugsindtægterne vil, maaske dog i mindre Grad, være svingende. Lagtinget maa derfor være forsigtigt med at paatage sig store Udgifter. Man gaar i en Rus over den store Krigsfortjeneste. Angaaende Maaden at skaffe Penge paa, er det noget, vi kan forhandle om, men vi maa undersøge Spørgsmaalet, om de kommunale Myndigheder er i Stand til at gennemføre den Skatteligning, som man kræver af dem. Det er muligt, at jeg er særlig sorbsvende, men jeg mener fremdeles ikke, at vore kommunale Forstanderskaber er i Stand til at administrere. Jeg paaviste ifjor ud fra min Erfaring Eksempler derpaa, men da var der jo flere, som mente det modsatte. Imidlertid vel jeg, at det kniber overordentlig med at finde Personer, som vil og kan paatage sig Arbejdet i kommunale Styrelser. Og det er jo ikke saa underligt. Vort Oplysningsvæsen er jo af temmelig ny Dato. Jeg gav mig af med i sin Tid at undersøge, hvorvidt de Skibsmandskaber, der mødte til Paamønstring, var i Stand til at læse og skrive, og det viste sig, at der var mange, som ikke kunde nogen af Delene. Man har jo ogsaa Eksempler paa, at en kommunal Styrelse er gaaet helt i Staa af den gode Grund, at den ikke har været i Stand til at besørge Arbejdet. Lad os derfor undersøge dette Spørgsmaal nærmere. — Saa er det blevet sagt, at forsaavidt Lagtingsarbejdet var fordyret, skyldtes dette hovedsagelig Hr. Andreas Samuelsen, thi han brugte for mange Ord. Det kan jeg aldeles ikke indrømme. Det sker ofte, at Hr. Samuelsen maa svare paa en- -to—tre- -fire af Modpartiet, og dertil maa han jo have sin Tid; jeg personlig mener nu i hvert Fald at hans Ord er langt mere værdifulde end de andres. Han har overordentlig gode Talegaver. Ja, nu ler Hr. Rasmus Niclasen, men *han* har saa sandelig ikke gode Talegaver, skønt han — altfor ofte — giver sig af med at optræde som Taler. Dette er altsaa i al Almindelighed min Opfattelse.

A. Samuelsen: Nú kom Rasmus Rasmusson innaftur. Teir upplýsningar, hann gav fáðni, hava altso víst seg ikki at vera rættir. Hann hevur soleiðis bara sagt frá, hvat tað muntliga referatið kostar, ikki sakreferatið, men talan var jú um referatið í síni heild. Táið hann benoktar mín pástand um, hvat løgtingið nú kostar, so vil eg biðja hann bara bíða — so fáa vit at síggja. Sá brikslar hann mer, at eg tosi sumógv og harvið dýrki tingið. Tað manglaði bara, at tað skuldi verið her sum úti á Frælsinum, at bara hann skuldi sloppið at tosa og vit aðrir noyðst at sitið og lurta oftir. Tann mátan sloppnr hann ikki at innføra her.

R. Rasmussen: Andrass Sámalsson hevur so sjáldan verið úti á Frælsinum, at hann helst máttí latið verið at tosa um, hvussu har gongur til. Aumans trúgvi eg ikki tað kemur sakini stórt við. Ig havi hildið meg til, hvat tað muntligu referatið kostar, sakreferatið er jú mestsum tað sama og tað, sum tað er dýrkað, má tilskrivast pappíri og prenting undir krígstíðini. Um Andrass Samuelsen vildi, so havði hann annars haft góða leyligheit til at síggja, hvat eg havi uppskrivað um hetta. Útreiðslurnar til alt referatið eru sum sagt gott og vel 7000 kr.; harav koma o. u. 2000 kr. innaftur í abonnement. Undirskotið er altso 5000 kr. uppá alt løgtingstíðindi. Hvar hann fær sítt 10,000 króna undirskot frá, veit eg ikki. Hatta er jú bara nin leysur pástandur. At standa og vevja við slíkum leysum pástandum er í hægsta grað at farna tingsins tíð. Andrass Sámalsson sýnist at hava so ógviligt ringt úlit á haldarunum av løgtingstíðindi, at teir ikki vilja betala. Tað ivist eg ikki í.

A. Samuelsen: Eg havi bara sagt: Latum okkum bíða til pengarnir eru inkomnir, so fáa vit at siggja. Eg havi ikki sæð haldara-fisturnar eingong, og veit aldeilis ikki, um hr. Rasmussens fol hava nakað uppá sog ella ei. Tað gleðir meg ivrigt, at hann nú hevur lingið hesar

útgiftirnar uppá 7000 kr.; tær munnu nokk fara at koma upp í 10,000, áðrenn endað er.

S. P. úr Konoy: Sýslumaðurin í Suðroy tykist vera so ógviliga beteinkiligur við at láta nakað í hendurnar á okkara kommunustýrum, meira enn tey hava nú at gera við. Eg havi ikki sæð nakað serligt í so máta utan í Suðroyar sýslu, men harfyri er tó eingin grund fyri okkum til ikki at fáa eina nýggja skattalóg. Hr. Effersøe nevndi eitt dømi, har tað kommunala arbeiði var »gingið í stykkir«, sum hann sogði; eg má siga, at eg eri ikki langt frá at halda við tí manninum, sum kort og gott niðurlogði arbeiði sítt, tá hinir noktaðu at taka nakran lut í tí. At tað hava verið nógvir skipsmenn á kantórinum hjá Effersøe, sum ikki hava dugað at skriva ivist eg ikki í, men tey viðurskiftini eru øðrvísi nú. Annars skuhu sýslumenninir hjálpa fólki í so máta. Hvatið agitatión angongur, sum hr. Effersøe sýnist at hava so ilt av, forstandi eg ikki, hví hann og aðrir fáast við at tosa bert um *okkara* agitatión. Eg havi ikki gloymt 1906. Ta agitatiónina, sambandsmenn tá brúktu, hava vit tikið læru av; hví skulu teir nú leika so barðliga í um ein maður hevur spurt um 4 milliónir! Tað er tó lítið, tá vit minnast aftur á hákellingarnar, sum sveimaðu uttanum ta føroysku jolluna o. s. fr. Nei, her kunnu vit vera líka góðir, latum okkum vera einugar um tað.

O. Effersøe: Jeg er ikke af samme Opfattelse som Konoy, men hele den spændte Situation førte til, at der har været ført en mer eller mindre skrap Politik. Konoys Fremstilling angaaende Formanden i en bestemt Kommune var ikke rigtig. Der kunde siges meget om dette. Men der er ingen Grund til at komme nærmere ind paa det. Med Hensyn til Spørgsmaalet om, hvorledes Kommunerne vil blive i Stand til at klare en saadan Skattelov, som foreslaaet, talte vi om ifjor.

Edw. Mortensen: Um ein forstandarskapsformaður ikki kundi stýra kommununi, so eru vøl áðrir menn í tí kommununi, sum kunnu gera tað. Hettar er eitt undantak, sum einki vísir. Eg skal viðganga, at eg eri farin skeivur í tí, at eg trúði, at tað var tikið lán úr sparikassanum fyri at dekka undirskot hjá sanatoriinum. Formaðurin upplýsir nú, at tað er ikki so. A. Samuelsen segði, at tað sær svart út viðvíkjandi tí støðu, sum amtskommunan er komin í. Eg síggi einki svart í tí. Hann nevndi »Smirila« í tí viðfangi. Men hann gekk sjálvur við til at keypa hettar skipið. Men hann vildi ikki ganga við til lutafelagið Føroyar, sigir hann. Ja, men hansara flokkur undantikið nokrum fáum vildi jú eisini, at tingið skuldi ganga við til at keypa eitt slíkt skip. Vit hava einki ansvar frálagt okkum.

A. Samuelsen: Tað gleðir meg, at mann lítur kommununum væl til. Lat okkum vísa tað nú, við at senda teimum skattalógaruppskotið, so at tær kunnu úttala seg um tað. Hvat viðvíkir minnitalinum og skipakeypinum, so stammaðu tí mans fyri viðtøkuni; har var eingin sambandsmaður við. R. Rasmussen er bráddliga blivin so fínur og fornemmur, at hann ikki kann svara mær aftur. Ólukkan er tó, at hann eigir einki til at svara mær aftur við. Mortensen dannar í hesum tilfeldi ein behagiligan mótsetning til hansara.

O. Effersøe: Mortensen sagde, at det Eksempel, jeg nævnte, ikke beviste noget. Det var heller ikke Meningen, at det skulde være noget Bevis. Jeg nævnte det blot. Med Hensyn til Købet af Fragtdamper var jeg og mine Partifæller enige i det Princip, at man kunde støtte en Opgave som den omhandlede, men ikke den Maade, paa hvilken Sagen blev foreslaaet. Vi vilde, om jeg saa maa sige, først se Dyret, før vi kom frem med Pengene. Sambandspartiet vil fralægge sig alt Ansvar for, hvad der er foregaaet i denne Sag, siden den sidste Tingsamling.

S. P. úr Konoy: Her er talað um ein einstakan kommunuformann, sum ikki kom so væl frá tí. Eg kenni ikki mannin persónliga og havi heldur ikki sagt, at hann ikki kundi klára tað. Men hann var komin í eina situasjón av sambandsmonnum, sum gjordi, at tað ikki var undarligt, at hann segði seg frá. At fýra sambandsmenn tvinga tann eina sjálvstýrismannin til at vera formaður, er nøvan rættur atburður.

O. Effersøe: I den Kommune, som der var talt om, var der en ganske udmærket Formand og Regnskabsfører. Han var blot Sambandsmand. Der blev sat alle Kræfter ind paa at faa en Selvstyremand ind i Kommunalstyret. Han fik man Selvstyremanden til Formand, og det kom til at gaa meget skidt. Han blev dog siddende, indtil der kom et Tidspunkt, da han saa,

at det ikke kunde gaa. Den Mand, som derefter overtog hans Plads, er en god Borger foruden det, at han er Sambandsmand.

Edw Mortensen: Tað var ein undarlig frágreiðing, sum Effersøe gav viðvíkjandi farmaskipinum. Hann sigir, at sambandstingmenninir kundu hugsa sær at vera við, men teir vildu *síggja* djórið fyrst. Minnitalið í logtingsnevndini í eykatinginum, sambandsmenn, var samsint við fleirtalið í øllum lutum utan í einum. Tað var at minnitalið setti tær treytir, at 350,000 kr. skulde verðu teknaðar privat fyrst. Hví skulu teir tá nú krúpa burtur frá, at teir í prinsippinum vóru samsintir við fleirtalið? Tá teir framhildu hetta, tá vóru 300,000 kr. teknaðar.

O. Effersøe: Nu under Flertallet er vi kommen ind i den uholdbare Situation, at vi ikke har nogen Lagtingsberetning fra det foregaaende Aar. Vor Stilling, om jeg mindes ret, var den, at vi vilde have bevilget et vist Beløb, og med Hensyn til Anskaffels n af Skibet vilde vi ikke tage nogen endelig Beslutning, men ønskede at se Skibet først.

S. P. úr Konoy: Eg kenni til, at har sum sjálvstýrismenn hava fleirtal í forstandarskapinum hava teir valt sjálvstýrismann til formann. Har gekk tað so, at sambandsmenn, sum hevdu fleirtal valdu sjálvstýrismann til formann. Hesin maður kundi ikki sloppa frá fyrr enn hann fekk hjálp frá doktaranum til at kunna siga seg frá.

M. Samuelsen: Viðvíkjandi stoðuni hjá minnitalinum til skipakeypið, so havi eg fyri mín part útbalað meg ímóti keyp av skipinum. Eg veit ikki, um tað er komið í hitt munnliga tinguppritið, men at eg ikki stonnaði við tí tað má tó onkur vita. Viðvíkjandi skattalóginni segði Mortensen, at mátin at líkna til amtsreparti tiónsfondin var uppá gjøt og dugdi ikki. Tað er ikki eg, sum likni har. Men við líkningini í eini bygd, sum tann vit hava, koma vit so nær at eg ivist í, um mann kann gera tað betri við einum øðrum skattamáta. Vit vita umtrent, hvat hvor maður eigir, um ikki so nær sum til hvørja krónu. Át tað er soleiðis, tað vitnar, at ongar skattaklagur koma hadani. Tær skattaklagur, sum eru komnar til tingið í fleiri ár, tær rokni eg ongar. Um hesin nýggi skattamáti kom í lag, so trúgvi eg ikki, at tað bleiv betri.

Edw. Mortensen: Um seinasti talari hevði hoyrt, hvat eg havi sagt, vildi hann vitað, at eg havi aldri frágingið, at sambandsflokkurin ikki stóð heilt samsintur viðvíkjandi farmaskipi, tí sýslumaður Samuelsen tók ein serstilling og Mikkjal Samuelsen við. Um skattalógina skal eg siga, at táið oin skal uppgeva sína inntoku sum grundarlag fyri skattasetu, so mega vera niddir til at kontrollera, at tað er uppgivið beint, og tað hava vit sett í straffebestemmilsunum og í at maðurin skal uppgeva skrivligt upaa Tro og Love. Ein maður vil kunna uppgeva av lítið í inntoku, men verður tað so uppdagað, fær hann stóra bót.

M. Samuelsen: Altso er tað konstaterað, at Mortensen við ollum sínum forsiktigheitsreglum ikki kemur nærri enn eg við mínum gamla máta, ikki nærri enn krómi av krómi.

Edw. Mortensen: Eg skal bert siga, at tann máti, vit gjordu lógina eftir ífjor, var tann máti, ið skattalógir verða gjordar eftir í øllum londum í nútíðini, og tað av monnum, ið hava minst líka so gott skil á hesum sum M. Samuelsen.

M. Samuelsen: Ja, tað man óivað vera menn í útlondunum, ið hava meira skil á hesum enn eg, men eg haldi, at hesin mátin hevir roynst góðan hjá okkum, og eg eri yvirbevístur um tað málsøkin omá; for rostin lati eg meg ikki lokka til hvørki at apast uppá kjotgrýturnar ella dansa uttan um gullkálvin.

A. Samuelsen: Edw. Mortensen sigir, at skattalógin var so góð; Zahlo sigir tvørtímóti, at hann kann ikki brúka hana og sendir hana aftur.

Edw. Mortensen: Tað sigir hann slett ikki. Lógin er góð sum skattalóg, og ein má trúgva oisini, at hon kemur aftur til tingið óframd, tí rikisstýrið heldur, at hon vil leggja inntokur, ið hoyra undir statin, inn undir logtingið.

Nyholm Debess: So vítt eg fataði, hvat M. Samuelsen segði, so heldur hann hann núverandi skattaordning vera meira rættferdigan enn tann vit fyrisógn ífjor, tí hann sigir, at ongar skattaklagur koma. Men mátin er líka órættferdigur uppeftir sum niðureftir; tann storri maðurin er ógvuliga skjótur at klaga, men tann minni

maðurin, ið betalir ov nógv, hann klagar ógvuligu sjaldan.

M. Samuelsen: Ég veit ikki, hvat man skal ganga eftir, tá tað ikki eru klagurnar yvir at blíva forórættaður. Ein fátækur maður hevir líka so góðan rætt at klaga, sum ein ríkur maður. Hví heldur N. Debess, at teir ríku fáa ov lítlan skatt? Vit vita fult út í okkara kommunu, hvat hvør maður tjenar og kunnu seta hann í skatt har eftir. Tað er bert tað eg forsvari, at teir siga, at mátin er órættferdugur, tað haldi eg ikki, men hann kann forbetrast kanska. Í kommununm, hvar eingin skattaklaga kemur, har kann ikki alt vera galið. Tað kann vera, at skyldmaðurin N. Debess eirir tann fræsara mannin, tað gera vit ikki har, sum eg eri frá. Ég vil ikki forða fyri einum ideali; alt kann forbetrast, og man kann ikki standa í stað, men eg má protestera ímóti óréttferdigheit.

S. P. úr Konoy: Eg vil spyrja M. Sammelsen, um hann, sjálvt um hann kann siga heilt ávíst hvussu nógv ein maður vinnur um árið, eisini kann siga, hvussu nógv hann eigir í bankanum ella sparikassanum, tí tað eigir eisini at skattast.

Edw. Mortensen: Umframt tað Konoy vísti á, hevir okkara nýggja lóg tað framum ta gomlu, at hon hevir vaxandi skala. M. Sammelsen vil vísa, at lógin er rættferdug, tí hann hevir brúkt hana rættferdugliga, men tað kunnu vera aðrir ið ikki hava gjørt tað.

O Effersøe: Jeg maa gøre opmærksom paa, at det er langt fra tilstrækkeligt, at man faar en Mands Indtægt at vide, man maa være klar over hele hans økonomiske Forhold, alle de smaa Enkeltheder, der betinger hans Betalingsevne.

M. Samuelsen: Man fær ikki akkurat at vita, hvat teir eiga; nei, ikki heilt bestemt; ein maður behøvir ikki at geva upp til dømis, hvat hann eigir í sparikassanum og hvørvítt tað var páboðið í hasi lógini kann og ikki siga bestemt men eg trúgvi tí ikki. Ég geri meg ikki betri enn aðrar, men tá ið eg skal skutta um nakað, má eg slutta út frá mær sjálvum og teimum viðurskiftum eg kenni, og veit ongan annan máta, og eg má heldur trúgva, at tað er nógv betri aðrastaðni enn í mínari kommunu. Edw. Mortensen framheldur, at man behøvir ójavnar procentir; tá man tekur øll forhold í betraktning, kann man skatta heilt rættferdugt, og vit siga sum so, at tá ein maður livir uppá størri fót enn ein annar, skal hann skattast fyri tað umframt. Sjálvsagt, tað er eitt stórt arbeiði av hesum, men man má loggja sær nær.

Sakin varð beind til liggjarnevndina.

Umsókn frá Vestmannahavn um stuðning til akveg.

J Guttesen: Hetta er eitt andrugandi, eg havi borið fram frá forstandarskapinum í Vestmanna. Teir biðja um at fáa tilskotið hækkað. Eftir at teir vóru begynntir uppá vegin, hevur tað víst seg, at hann bleiv væl dýrari enn hann var ansligin til. Ég vil mæla til, at sakin verður víst til liggjarnevndina.

M. Samuelsen: Eg vil eisini anbefala, at tingið tekur við hesum andragandinum og roynir at lúka tað besta hjartur úr tí. Hesin vegurin liggur Vestmenningum nógv uppá hjarta.

P. Nielsen: Eg havi altíð verið av tí meining, at tað hevur stóran týdning at fáa hensigtsmessigar akvegir. Sjálvt um vit ikki kunnu rokna við at fáa eins nyttu av vegum og aðrastaðni eri eg klárur yvir, at teir kunnu hava ómetaligan týdning, har tað letur seg gera at byggja vegir. Íunidlartíð hava vit dømir, m. a. herfrá Havnini, um at tað kann taka nógso langa tíð at realisera slík anlegg: tað eru soleiðis o. u. 3 ár síðani at Havnar borgarar komu ásamt um at fáa ein veg lagdan frá Hálsi inntil Sundsbrúgv, og teir vóru fegnir við, tá kommunan vildi yvirtaka hann. Tá kundi ein vóna, at hann skjótt kundi fara og verða liðugur. Men alt tað enn er gjort av hesum vegi eru nokur pettir her og har. Tað hevði tí verið gott, nu vit í framtíðini fingu vissu fyri frammantundan at vegirnir, sum sokt verður um tilskot til, verða gjørdir sum skjótast. Skal tað ganga á sama hátt sum við hesum fyrrnevnda vegi, so kann vegbyggingin í Føroyum hava langar útsiktir. Vit eiga tí at fáa innført bestemmilsir, sum sikra okkum ímóti, at slík vegarboiði verða drigin út í eina óyvirskoðiliga framtíð.

J. Guttesen: Eg gloymdi at siga, at andragarnir biðja um at fáa lóðina forlongda til 1923.

Sakin verð beind til figgjarnevndina.

Bonarbrøv um viðurlag fyri bjarging av mannskipan.

Edw. Mortensen: Sum tingmenn vilja minnast, strandaði ein donsk skonnart «Caspar» á Lítlu Dímun seinasta vetur. Nakrir menn av Tvøroyri bjargaðu mannskapi og mistu harvið ein arbeiðsdag umframt útreiðslur til petroleum. Teir hava spurt hjá amtinum, um tað ikki kundi verið ein máti, at fingið hetta tap gottgjort; amtið hevur svarað, at tað ikki kendi nakran máta til at gottgera tíðarspell; petroleumnið fáa teir aftur goldið, tað var 30 kr. Eg vil mæla til, at vit senda sakina til figgjarnevndina, so hon kann kanna eftir, um her er nakað at gera við.

O. Effersøe: Saavidt jeg mindes, forelaa der i det herombandlede Tilfælde dette, at de paagældende Personer tog fra Tveraa om Aftenen Kl. 9½ og var tilbage igen efter godt og vel et Par Timers Forløb. Udgiften til Petroleum faar de jo godtgjort, Spørgsmaalet er her, om vi skal yde Godtgørelse for Arbejdsspild, Næringstab. Dette er dette Spørgsmaal, som Budgetudvalget nøje bør overveje: Hvorledes man tidligere har forholdt sig i lignende Tilfælde og hvilke Konsekvenser det kan komme til at medføre, hvis Lagtinget slaar ind paa at yde Godtgørelse for Redningsarbejde. Tidligere, naar Nød har været paa Færde og Folk har været savnede, har gerne de Personer, som var i Stand til at udføre Redningsforsøg, ydet deres Hjælp uden Vederlag. Det er jo ikke Smaating, hor kan blive Tale om; jeg skal saaledes nævne, naar Mennesker bliver borte eller savnes paa Vej mellem to Bygder, hvorledes da disse Bygders Mandskaber opbydes for at søge efter de savnede. Ligeledes paa Søen; her kan der ofte være flere Baadsmandskaber, som sætter deres Liv i Vove, bortset fra, at de udsætter sig for alle Ubehageligheder, for at komme en ækelt til Hjælp. Der har tidligere aldrig været krævet Betaling for sligt. Nu foretages ganske vist de fleste Redningsforsøg paa Havet med Fartøjer, hvis Benyttelse medfører Udgift. Udgifter til Petroleum. Ifjor benyttedes «Smirila» i et saadant Tilfælde, og der blev da ydet Godtgørelse. I Aar har vi haft et Tilfælde paa Suderø, hvor et Motorbaadsmandskab var blevet borte og der desaarsag opbødes flere Baadsmandskaber for at lede efter det; saadanne Redningsanstalter foraarsager selvfølgelig store Udgifter, og Spørgsmaalet bliver saa, hvem der skal betale dem. Jeg ved ikke, hvilken Stilling Lagtinget vil indtage, men skal vi komme ind paa at lade det Offentlige betale i saadanne Tilfælde, saa vil jeg blot gøre opmærksom paa, at det er meget betydelige Beløb, her bliver Tale om, hvis der skal ydes fuld Dækning, altsaa Godtgørelse for Benyttelse af Arbejdskraft. Det kan komme til at blive et betydeligt finansielt Spørgsmaal, hvorledes man vil tage paa denne Sag.

Edv. Mortensen: Síðsti talarin segði, at hesin maðurin ikki hevði verið burtur meir enn tveir tímar. Men mær er sagt, at teir fóru um kvøldið og komu aftur um náttina. Harvið mistu teir tann næsta arbeiðsdagin í meiri ella minna lagi. Effersøe talaði síðani um bjarging, og at tað higartil hevði verið gjort fyri einki at bjarga fólk. Alt viðvíkjandi spurningunum um bjarging av fólk í Føroyum liggur ósikkurt. Tað er gjort ovlítið fyri at organisera eina bjargingarskipan her á landi. Tað ber ikki til, at eingin organisatión er fyri at bjarga fólki, sum er í neyð á sjónum ella aðrastaðnis. Á Noreg er eitt privat bjargingarfelag, sum fær stuðning frá statinum. Men hendan sak er ikki á dagsordaninum, so eg skal ikki tala meiri um hana, men áðrenn langa tíð vilja vit — vóni eg — koma til eitt organiserað redningsvesin her.

O. Effersøe: Den sidste Taler mente, at inden en kort Tid maatte man faa organiseret et Redningsvæsen. Jeg vil sætte et Spørgsmaalstegn derved, fordi en Ordning af et tilfredsstillende Redningsvæsen vil være en overordentlig stor Opgave, idet Befolkningen bor meget spredt og en saadan Foranstaltning derfor vil blive meget kostbar. Man maa vistnok indtil videre holde sig til de Forhold, som nu er. Beskytteren vil sikkert som hidtil altid være rede til at yde Hjælp og ligeledes Folk, som bor i Nærheden. Beredvilligheden i den Henseende har altid været til Stede. Der er Forskel mellem Forholdene her og andre Steder, hvor Redningsvæsenet er organiseret med Hensyn til Skibe og deres Besætning. Der har i de nærmest fore-

gaaende Aar varet nogle Strandingar her, men det kan man ikke regne med. Her bliver der Brug for Hjælp, naar aabne Baade eller Motorbaade savnes. Naar saadant sker, bliver Familien eller paarørende bange og vil sætte Folk i Bevægelse og saa at faa Motorbaad ud til Undsætning af de savnede. Dem man saaledes henvender sig til, plejer i den Slags Tilfælde altid at være beredvillige til at tage ud. Jeg tror, at Redningshjælp vil komme til at foregaa paa samme Maade som hidtil indtil videre.

Joen Poulsen: Jeg tror, at vi snart kommer saa langt, at vi ældre føler Skam over at være Færinger. Naar man tænker paa, hvad der gennem Tiderne er gjort her for at redde Mennesker eller blot for at flytte baade friske og syge Mennesker fra det ene Sted til det andet, saa bliver man bedrøvet over, at der kræves Betaling for at sejle til Lille Dimon fra Tverøa for at redde skibbrudne Folk. Der er for baade paa Havet og paa Land gaaet Folk ud at søge efter nødstedte Mennesker uden at kræve Vederlag derfor. Hvis man i dette Tilfælde indskrænkede sig til at faa Petroleum og andre Udgifter godtgjorte kunde det vel være tilstrækkeligt. Det, som Mortensen talte om, at der skulde ligge et Redningsfartøj klart, er en hel anden Sag.

Bilh Mortensen: Eg skal nerta eitt sindur enn við bjargingarspurningin í Føroyum. Tað vísir seg, at júst tær atfinningar, sum Effersøe fordi framm, fordu teir eisini framm nót bjargingartonkanum í Noreg. Í Noreg galt tað um at bjarga fiskarum. Áðrastaðnis høvdu teir fastar statiónir. Tí gekk tað so leingi, áðrenn Normenn kundu fáa teirra múnað gongt. Teir noyddust so at siga, at hava flótandi statiónir, bjargingarfør, redningskøjter, sum júst eru til at bjarga fiskarar við. Har eysturi hava teir gott dømi fyri okkum til, at vit kunnu vita, hvussu vit skulu taka hesa sak. Hetta er ein stór sak, og um onkur ætlanfyri tingið tók hana upp, kundi vel einaferð komið gongd á hana. J. Poulsen sigir, at tað havur verið siður, at bjarga fólk fyri eingi. Hetta kann skiljast undir tein viðurskiftum, vit hava verið undir fyrr. Men tað skuldi nú ikke vera so, at fiskarar, sum fara út at hjálpa fólki, harvið skulu missa nógv av sínu kostbara tíð, uttan at teir fáa tað rindað aftur. Tá ein sær tað frá tí síðuni, so kann ein ikki áttala seg so fordømandi um bonarbrævið.

O. Effersøe: Jeg skal bemærke, at det stiller sig tvivlsomt, om de Personer, som hjalp ved omhandlede Lejlighed, ønsker Betaling for Arbejdet. Jeg har talt med den ledende Person. Han ønskede, saavidt jeg forstod, Petroleummen godtgjort og intet andet.

Sakin varð beind í figgjarnevndina.

Lonhækkan til fiskavrakara.

Th. M. Strøm: Hettar er ein sak, sum er komin frá fiskavrakarunum í Suðroy. Teir ynskja at fáa tímalonina setta upp til 1 kr. í tíman frá kl. 6—kl. 6 um dagin, 1 kr. 50 frá 6—9 um kvoldið og 2 kr. um tíman annars. Tá mann hevur í huga, hvussu nógv allar vørur eru gingnar upp í hesum árum, kann tað ikki sigast at hetta er ov nógv. Tímalonin var fyrr 50 øyr í tíman, men tað sum arbeiðsmonnum torvar at keypa er 3—4 ferðir so dýrt nú sum fyrr. Hesir menn geva til grund fyri sínum andragandi, at teir altíð mugu standa til reiðar til at gera sítt arbeiði, og tí ikki kunnu sleppa til at sokja sjógvin sjálvt um nógv kundi veru at forvinna av útróðri. Hetta eru menn, sum hava eitt stórt ansvar og mugu bæði verða álítandi og samvitskufullir í teirra gerningi; tí tað hevur nógv at týða fyri Føroyingar, at teirra fiskur fær eina góða viðgerð. Eg vil mæla til, at tingið styðjur hesa sakina. Eg kann annars leggja aftrat at eftir úttalilsi frá keypmannafelagunum hava keypmenn einki ímóti, at fiskavrakrarnir fáa hesa lonhækkan. Eg mæli til, at sakin fer í nevndina fyri ynniskar sakir.

O. Effersøe: Naar man forhøjede Lønnen fra 35 Øre til 50 Øre i Timen, saa var det, fordi man forstod at disse Mænd blev lønnede galt under Hensyn til det svarlige Ansvar, som de har. Naar vi saa ved, at Lønninger overhovedet er steget meget betydeligt siden den Tid, kan man ikke anse det Krav, der her er fremsat, for uberettiget. Det glæder mig, at man fra den anden Side, der skal betale, nemlig Købmændene, har vist Forstaaelse af denne Sag.

Paul Nielsen: Eg skal einki hava imóti, at henda sak verður gjøgnumførd, men eg skal henstilla, um hon ikki rættari hoyrir heima í budgetútvalginum; hetta er jú kortini ein økonomiskur spurningur.

R. Rasmussen: Vit skulu jú ikki betala lonirnar úr logtingsins kassum, so fíggjarnevndin fær í so máta einki við sakina at gera.

Sakin varð beind til nevndina fyri ymiskum málum.

Rættargongdarlóg fyri Føroyar.

(3. viðgerð.)

Edw. Mortensen: Eg skal mæla til at stemma fyri tí uppskoti, ið nevndin hevir sett fram.

Formaðurin: Forslaget gaar ud paa, at Sagen udsættes til næste Aar.

Í hesum varð samtykt við 15 atkvøðum.

Fundur miðvikudag 20. august.

Formaðurin: Udenfor Dagsordenen skal jeg meddele, at der fra Elektricitetsudvalget er fremkommet Meddelelse, at man har vedtaget at honorere den af Amtskommunen engagerede IngeniørBlaauw med 16 067,82 Kr. Da Amtsrepartitionsfonden ikke for nærværende raader over tilstrækkelige Midler til at udbetale dette Beløb, vil det være nødvendigt at opkræve et Laan, hvorom Lagtinget skal tage Beslutning. Da dette Spørgsmaal gerne skulde bringes til Afslutning indenfor saa kort Tid som muligt, har jeg tænkt mig at sætte det til 1. Behandling i Dag som sidste Sag paa Dagsordenen. Ifølge Forretningsordenen kræves herfil, at ¾ af Medlemmerne stemmer derfor. Hvis ingen har noget at indvende derimod, sættes denne Sag til 1. Behandling i Dag. Det er altsaa vedtaget.

Føroyskt logsavn.

R. Rasmussen: Henda sakin lá á tingi ifjor, men sovitt og veitt er einki gjørt við hana síðani. Eg vil mæla til, at sakin verður víst til fíggjarnevndina.

(Sakin fór í fíggjarnevndina).

Formaðurin: Sagerne 151, 152 og 153 er indkomne efter Udløbet af den for saadanne Sagers Indlevering fastsatte Frist. Jeg vil spørge, om nogen af Medlemmerne stemmer imod, at de forelægges til Behandling. - - Da dette ikke er Tilfældet, gaar vi over til Sag 151.

Stuðningur til nýggjan skúla í Gøtu.

S. Pátur Kunoy: Sólnarstýrið í Gotu hevur borið fram á ting hesa umsókn um stuðning til eini nýggj skúlahús í Gøtu. Vit hava roynt at greiða málið sum best fóremm vit logdu tað fram á tingbordið og hava tessvegna haft ein konan og kunnugan mann fyri okkum; tað er hansara arbeiði, vit nú loggja fram. Forstandarskapið hevur biðið hann svara tí uppá 3 spurningar, fyrst hvat hann heldur um hin gamla byggingin, og um hann kann tilráða at byggja alburat honum. Kundi hann ikki tað, so bóðu vit hann gera tekningar og yvirslag til ein nýggjan skúla. Hann sigur, at hann ikki á nakran háttt heldur hendan skúla vera hóskandi til eina bygd við so stórum barnatali: vinleygum eru, ovsná, rúmini hava minni ein so tað kubikinnihald luft, sum eigur at vera, eisini kororalúfsini eru ovsná. At byggja alfrat hóskar planurin. heili byggimátin ikki til. Hann hevur so givið okkum tekningar til ein nýggjan byggning við trimum stórum klassaverilsum, eini fjósstatu sum av regeringini fyriskrivað, eina sokallaða handgerningsstovu. tí vit meina tað kann vera neyðugt. at bornini hava eitt verilsi umfram skúlastovurnar hvar tey t. d. kunnu eta sín mat. Hesin nýggi byggingarin er stórur og kostar nógv. men forstandarskapinum dámar planin væl og tey prinsippir, her eru lagd til grund, men tað hevur heldur einki imóti, at logtingið tekur spurnúlið upp av nýggjum, fær nýggjar tekningar og yvirslog tilveggis og tekur stoðu til spurningin, um vit skulu vala um hin gamla skúlan ella byggja

ein nýggjan. Eg vil biðja tingið taka ímóti hesi sak við allari tí vælvild, hon krevur, og fyrisiá, at hon verður víst til kirkju kassanevndina.

A. Samuelsen: Tað er sjálvsagt, at hvørja ferð slíkir spurningar koma fram um at veita hjálp til betri og meira hóskandi skúlabyggningar, so er logtingið á einum máli um at gera sítt besta. Tá nú fyriliggur ein sak um at fáa Gotu sókn betri skúlalíkindir, er tað skiligt, at tann almindiliga hugsan eisini er galdandi her: at stýðja hetta ynski alt tað, vit eru mentir og arbeiða fyri at statskassin letur so stórt tilskot sum moguligt. Men tað kann jú ikki noktast at henda sak er forferdiliga stór: skúlin er ansligin at kosta 150,000 kr. - tað er umbrent 4 ferðir so nógv sum vit eru vanir at anvenda til skúlabyggningar: ganska víst hava teir tá bara haft eina skúlastovu og hús til ein lærara. Eg veit ikki, hvussu nógv ein kommuna yvirhovur orkar at læta til skúlabygging, serliga ikki hvatið Gotu er for fyri; hon er jú ikki av teim størstu. Sóknin er nógso væl stillað, men har eru eingir ógviliga stórir skattaýtarir. Og hetta má bliva ein ógviliga tung byrða fyri kommununa. Sjálvt um tað kundi fingist so stórt tilskot sum tað, vit fingu til realskúlan, so bleiv tað ikki meir enn 40,000 kr. Hetta var eitt stórt tilskot og tó hevði tað verið ógviliga pínkulítið til henda skúlabyggguing; har bliva yvir 100,000 kr. eftir til sóknina at bera. Eg haldi tað vera betoinkiligt at logtingið gongur við til at leggja so stórar útgiftir á Gotu sókn, sum tykist hava hug til at fremja eisini onnur mál, ið kosta pengar. Eg vil gjarna vera við til at gera, hvat gerast kann fyri at Gotu kann fáa so góð skúlalíkindir sum moguligt, men her má eg kortini henstilla til yvirveyilsi, um vit ikki kunnu teinkja okkum at stedga við hesi sak soleingi prísirnir eru so hogir sum teir eru. Kann tað ikki hugsast at læta eina slíka sak stegga soleingi prísirnir eru so hogir sum nú? Allir skilamenn eru samsintir um, at tað neyvan varar nógv ár áðrenn prísirnir verða lægri. Eg vil tá spyrja síðsta talara, um hann ikki heldur at skúlin í Gotu er so fragur, at tað er betri at bíða í nokur ár heldur enn nú at byggja ein, sum skal kosta 150,000 kr. Eg vil meina, at tann yvirvejandi stemningurin í Gotu er fyri at útskjóta hendan spurning. Og vit kunnu heldur ikki tilráða at byggja nú uttan at tað er neyð fyri hond. Hetta sigi eg ikki fyri at forða fyri at Gotu fær nýggjan skúla: men og haldi, at tað eru so stórar betoinkiligheitir. Eg vildi ganga við til skúlan í Leirvík, men tá eg sá yvirslagið, so kundi eg ikki gera tað. Man skal hopa, at vit um 5 -10 ár kunnu fáa ein byggning, sum ikki kostar meir enn helft aftanímóti nú. Eg og nógv partí eru við til, at hendan sakin fer í nevnd.

S. P. ár Konoy: Tað var mær mikið athugavert, at A. Samuelsen talaði so sakligt um hetta málið. Hann skal hava rætt í, at spurningurin er alvarsamur so væl fyri kommununa sum tingið. Men einhvor tingmaður forstendur, at vit hava fingið ein mann, sum skal ráða til um tað skal valast um tað gamla ella um byggjast skal nýtt. Eg eri samsintur við síðsta roðaranum, at tað er eitt vanskiligt verk at byggja nýtt, sum prísirnir nú eru. Um vit vissu, at tað bleiv bíligari um nokur ár, vildu vit gera alt fyri at bíða. Eg fari ikki at svara til tað, sum A. Samuelsen talar um fólkastemning í sóknini. Vit vita jú, at tað so manga staðnis er ein trongd til at fáa betri skúlar og betri lærarkreftir. Teim dáma ikki í okkara sóku at senda hornini til Havnar í skúla: tað er dýrt og teim dáma ikki tað prinsippið. Táið byggningurin fer at kosta 125,000 kr. - A. Samuelsen nevndi skeivt 150,000 kr. - so er hetta bæði dýrt og ivasamt fyri kommununa. Um ikki prísirnir fara at falla, so vilja vit fara undir uppgávuna, men ikki fyrr enn fleiri sakonir hava útttalað seg um hvat eigur at gerast. Eg vil í hesum viðfangi nøla til, at tingið framskaffar eina týpu fyri skúlabygginguum. Biður tingið forstandarskapið at steggja til eitt solitt grundarlag er framskaffað, so hava vit einki ímóti tí.

O. Effersøe: Forleden Dag, da der var Andragende fremme vedrørende Opførelse af Skolebygning, spurgte jeg, om det var rigtigt, at Tinget gik med til, at der blev bygget to Lærerboliger. Der blev svaret, at om Kommunerne ønskede det, kunde Tinget ikke sætte sig imod. Her er et Principspørgsmaal. Tinget maa for det første se at bygge forsvarligt, saa Lokalerne bliver gode nok. Tinget maa dernæst passe, at Foranstaltningerne ikke bliver kostbarere end nødvendigt. Det maa baade Kommunerne og Tinget gøre. Sagen ordnes bedst ved, at man skaber en Normaltype for Skolebygninger, hvorved man ogsaa skal kunne spare unødvendig Flothed. I den Henseende vil jeg henlede Opmærk-

somheden paa, at der maa bygges saaledes, at Bygningen let lader sig udvide. Jeg har set en Tegning, hvor der var en Lærerbolig paa hver Side og Skolestuerne i Midten. Det er i Strid med den Tanke, at Skolestuerne nemt skal kunne udvides.

S P. fár Konoy: Vit í Gotu eru strandaðir á prinoipppinum, sum Effersøe talaði um viðvíkjandi at víðka um. Har er leiligheitin hjá læraranum ó alin hog. Á hendan hátt ber væl til at rúmka um skúlastovurnar, men lejligheitirnar verða forhogar og ringar at búgva í.

O. Effersøe: Jeg synes, at det paa den Maade ikke bliver saa heldigt at udvide. Det koster at omdanne Lærerboligen til Skolestue. Man bør ordne sig, saa at man kan bygge til.

A. Samuelsen: Konoy sigir, at um teir kundu vera fullvissir í, at tað bleiv bíligari um nokur ár, vildu teir bíða við hesi sak. Fullvissir her kunnu vit ikki verða. Menn skilamenn halda at verri enn nú kann tað neyvan fara at verða. Fraktirnar ganga væl niður heldur enn upp og samaleiðis prísurin á timbri og cementi. Eg haldi, at ein hópur av Gøtumonnum vil halda at tað sum her er talan um at byggja fyri tó verður ein ov tung byrða at leggja á seg. Og tað mann vera tann almindiliga meiningin har at skúlaviðurskiftini í Gøtu í stundini eru forsvarlig. Hetta skal eisini vera ein kompliment til Konoy. Tað er natúrligt, at teir sum representera Gøtumenn og harmfillum eru eisini eg, eru beteinkiligir við at leggja so stórar útreiðslur á kommununa. Eg trúgvi, at um tilskotið frá statinum verður nóg so stórt, so verður kortini ómetiliga nógv eftir til kommununa at betala, tað kann kanska koma til at vera einar 100,000 kr eftir til kommununa at betala til skúlabyggingar. Eg havi eisini hildið, at vit skuldu hava eina týpu uppá skúlabyggingar, men eg má meina, at her mugu vit lata kommununar ráða nakað. Táið talað verður um eina normaltypu, so meinti eg, at tað skuldi vera ein minimaltypa, sum man ikki skuldi ganga undir; um onkur kommuna vil flotta sær ella hevir ráð til at geva meira, skal eg einki hava ímóti, at skúlahúsini verða bygd yvir normaltypuna. Eg skal ikki siga meira nú; útvalgið vil jú yvirveya sakina, og eg venti, tað kemur til tað sama sum eg, at byggingarprísirnir nú eru so høgir, at vit standa ókkum við at bíða.

S P. fár Konoy: Eg má gera tingmanninum úr Fuglafirði kunnugan við, at tað tal vit komu til, er ikki nakað ógviliga hogt tal. í forhold til tann umtalaða bygning og nútímuprísar, og vit eiga at minnast, at táið teir skulu byggja ein skúla á landsbygd í Danmørk, so koma teir ikki til minni tal enn hetta her og vit kunnu vera vísir í, at kommunur har kunnu byggja líka so bíligt í Danmørk sum her. Vit hava nú í mong ár hoyrt so nógv um, at okkara skúlaskapur er primitivur, at eina ferð mega vit til at bøta um tann ringa standin, tó at ein má vera klárur yvir, at tað skal vera eitt ódnartak; vit kunnu ikki halda við at tosa uppísaman um, at vit eiga at bíða og bíða, og tað er eisini ein spurningur, hvussu leingi vit hava ráð til at bíða. Utan pening greiðist skúlaspurningurin ikki, og skal tað vera nogutligt at fáa skúlaskapin í betri lag, megn skúlahúsini gerast nýtilig. Eg haldi ikki, at tað átti at verið tørvandi, at blanda mín persón inn í hesa sak, eg havi sum lærari í Gøtu ikki kunnað sagt annað, enn at skúlahúsini har ikki eru forsvarlig.

A. Samuelsen: Eg trúgvi, at skúlahúsini eru forsvarlig, og at tey væl kunnu brúkast eina tíð enn. Tað er við hesum sum yvirhøvur táið handverkarar skulu undirsøkja t. d. eitt sjúkhús saman við einum doktara fyri at vita, um tað er brúkbart, so koma teir altíð til tað resultat, at sjúkhúsið er nógv ov primitivt, tí teir koma til at samanlikna tað við sjúkhús, soleiðis sum doktarin krevur tað; uppá sama máta verður við hesum sýni av skúlum okkara. Eg trúgvi, at man væl kann bíða enn nokur ár í Gotu: vit hava ein skúla í Leirvík, ið tað er langt óforsvarligari at brúka enn skúlan í Gotu. Eg haldi tað vera ófora nógv at skula geva til skúlar í Gotu sóku 150,000 kr., og eg veit ikki, hvussu kommunan stillar seg til hesa stóru útreishu. Konoy sigir, at vit huva ikki ráð til at bíða við skúlasakini; eg trúgvi ikki tað verður torfoarri nakran tíð enn nú at fara undir hana. Eg trúgvi, at um vit nú skaffa ein góðan plan yvir eina normaltypu, so er nógv gjort; at fara til at biðja um bevillingar nú, uttan at tað skal muna nakað, kann einki nytta. Eg vil spyrja tingmannin úr Gotu, um hann kann hugsa sær, hvat tilskot søkurin í Gotu vil fáa frá statinum? Um teir nú fáa 20,000 kr., ella 30,000 kr., ja lat okkum siga, at staturin gevur teimum líka nógv sum hann gav til realskúlan, nevniliga 40,000 kr., so trúgvi eg, at kommunustýrið

í Gøtu vil beteinkja sog uppá hetta, og heldur lata hana fuglin fljúgva. Vit eiga at lata útvalgið undirsokja hetta og aðrar spurningar, og tað vil bert vera til vinning fyri okkum.

H C W.-Tórgarð: Eg vil fyrst protestera ímóti tí, ið beint nú varð framhildið, at báið eitt forstandarskap vendir sær til handverkara um at sýna skúlahús, at tað so skulu verða tikin onnur hensýn enn reint faglig. Eg ma siga, at mær hevði líkst væl á, um vit her á tingi høvdu haft ein skúladag, hvar vit bert høvdu skúlamál til umrøðu, tí vit hava nú so nógvar slíkar sakir, bert í ár eru her umsóknir frá 5 plássum um nýggj skúlahús, nevniliga umframt úr Gotu eisini úr Leirvík, Fuglafirði, Klakksvík og Vági. Sakin úr Klakksvík lá fyri ífjør; tá samtyktu vit ein innstilling, sjálvt um vit kundu ikki góðkenna tann fyriliggjandi planin; har eru heilt ótolilig forhold at arbeiða undir. Á sama hátt er í Leirvík og Fuglafirði. Í Gotu er tað væl mest tað, at har er bert ein lærari til ov mong børn, so mong, at tað kanska átti at verið tríggir hennara har. Her hevir verið talað um teir fyriliggjandi yvirslagsprísir, og tað er jú ikki lutt at siga nakað bestemt um teir, sum nú her í teimum umsóknum ið eru komnar til tingið. Har er tann stóri skúlin í Gotu ætlaður at kosta 125,000 kr., meðan tann væl minni skúlin í Leirvík er settur til 156,000 kr. Tað hevir higartil verið soleiðis, at staturin hevir givið fastan stuðning til skúlabyggingar, og vit hava altíð tilmælt, at staturin skuldi geva helft av yvirslagunum. Eg dugi ikki at siggja annað, enn táið kommununar biðja um stuðning til skúlar, ið skulu kosta so mikið, sum her er umsókt, at tær tá vita seg føran fyri útreislunum, og vit mega biðja statin um stuðning á vanligan hátt, nevniliga um helft av kostnaðinum. Eitt annað er, hvat ið bevillingsmyndugheitirnar vilja geva, táið talan verður um so nógvan pening sum til skúlahús í Føroyum, har verður sókt um stuðning til 5 skúlar á 70,000 kr. Her hevir verið tosa um, at vit skulu royna at fáa ein skúlaplan og eina skúlatypu; eg má mæla ollum tingmonnum frá at royna at fremja hetta á tann hátt, at tað á einum kantóri skal liggja planur, eftir hvørjum allir skúlar í Føroyum skulu gerast.

S. P. úr Kunoy: Tingmaðurin úr Fuglafirði spurdi, hvat ið kommunustýrið í Gotu mundi vilja gera, um staturin ikki gav nóg stóran stuðning. Tað ið vit vilja vita, er um staturin vil geva sama stuðning, sum hann hevir givið higartil, nevniliga helft av kostnaðinum; vil hann ganga burtur frá tí, má kommunan taka nýggja stoðu til spurningin. Aðrenn kommunustýrið í Gotu er komið fram við hesum týdningarmikla máli, hevir tað sjálvandi grannskað tað gjølla. Tingmaðurin í Fuglafirði helt, at skúlin í Gotu, væl kundi brúkast nokur ár enn, tí tann í Lorvík var verri. Nú, ein skúli verður væl ikki meira nýtiligur, um onkar annar er enn minni nýtiligur og eg vil spyrja, hvat menn halda um ein skúla, hvar 80 børn samlast í einari forstovu, ið er 14½ alin breið og á miðjuni ikki breiðari enn 16 tummar, tí har er ein kanin mitt fyri, og hvar einki ljós kemur utan gjøgnum eitt vindeyga yvir dyrunum, og tað vendir móti norðan. Utan at eg skal siga nakað ávíst um tað kann vera skúlans skyld, so eru fleiri børn í Gotu deyð av tuberkulum, men sjálvandi eru ring skúlaviðurskifti ikki til gagns fyri sjúk børn. Tað kann vera, tað er rætt, at tilstandurin er fragari í Gotu enn í Leirvík, men tað er eingin trøvst, vit mugu minnast, at eisini aðrar lógir hanga yvir okkum, t. d. tuberkulosulógin. Eg veit ikki, um vit kunnu forsvara, at siggja heilt burt frá tí. Tað er tó nógso stórt tal av børnum, ið beinleiðis hava verið smittað av tuberkulosu. Vit eru sum sagt viljugir til at rætta okkum eftir løgtinginum í hesi sok og fáa vit fullvissu fyri at prísirnir verða væl lægri um nokur ár, so ætli eg vit vilja bíða sum longst.

A. Samuelsen: Eg hugsi tingmaðurin Tórgarð missfatadi meg, tá hann helt meg siga, at ein hondverkari altíð vildi siga at tann gamli skúlin var ómoguligur, tá spurnamálið stóð um tað: at byggja aftrat ella byggja nýggjan. Soleiðis havi eg aldri úttalað meg. Mín tanki var tvørtímóti tann, at ein hondverkari, helst ein so duguligur sum hann, ið gjort hevur hesar teknaingarnar, skiligt nokk máttí siggja uppá henda spurning sum byggmeistari, við eyga fyri tí vakra, og eg ikki aleina forstandi, at hann kemur til eitt sovorðið resultat, eg haldi ikki hann kann koma til nakað annað. Okkara sak er tað harímóti at yvirveva, um vit kunnu leggja somiklan dent uppá tey arkitektoniska hensýnini sum arkitekturin ger. Eftir hr. Tórgarðs orðum skuldi ein trá, at eg mestsum hevði insinuerað hondverkararnar, men tað er eitt kompleft misforstáilsi. Hann hevur nokk ikki verið væl upplagdur, tá hann helt seg hoyra

nakað slíkt; og rættaði mermast ein kompliment til hondverkararnar og helst henda framrakandi hondverkaran. — Eg havi sagt, at eg standi her sum representantur fyri Føtumonn, og tað má og væl siga, tí eg eri jú valdur fyri Eysturoynna. Og sjálvt um ein sær nógso ahmennt uppá eina sak, so kann ein ikki siggja heilt burt frá tí kresi, maa er valdur fyri. Eg havi — fyri at bróka eitt orð sum hr. Konoy dámar væl, fullvissu fyri, at Føturmenn fegin vilja hava ein betri skúla, men halda at kostur hann uppum 100,000 kr., so er hann ovdýrur. Her veit eg meg í yvireinsstemmilsi við ein ótrúligan part av Føtumonnum. Sjálvsagt hava vit eisini onnur hensýn at taka enn tey til pengapungin, men er hin gamli skúlin so ganska óforsvarligur at born í hópatali verða smittað har av tuberkulosu og doyggja, so let okkum skræða hann niður og sum skjótast fáa bygt ein, sum er betur. Tá so forholdini verða soleiðis, at vit kunna byggja hann størri, kann tað ske við tilbygging. Hvis hr. Konoy helt forholdini vera so óforsvarlig sum hann sigur, so mátti hann hall latið tey undirsokt av doktaranum; doktarin plagar viðhvort at koma til Føtur at undirsokja viss forhold. Yvirsunnheitskommissiónin átti eisini at givið erklering um henda patientin, men hann man nokk ikki vera so óforsvarligur kortini.

S P. úr Konoy: Nú er Andrass Sámalsson komin so vítt sum at tosa um ein vissan patient. Hesin patientur var undirsoktur í 1906 og erkleraður at vera heilt óbrúkuligur. Tað vóru sethúsini hjá læraranum, ið tá livdi undir heilt ómenniskjantligum forholdum og noyddist at fáa doktaran at byggja eftir. Harfyri fyriliggur doktaraattest. Men eg havi ikki sagt, at skúlastovan er smittufarlig. — Vit hava vilja haft henda spurning undir dehatt og vóna, at hann verður fordur fram til ein góðan loysning, men hann skal ikki vera bráfengis.

Sakin verð beind til kirkjukassanevndina.

Studningur til skúlaskeið fyri lærarar.

S P úr Konoy: Hendasak er lík teimum, vit hava haft tey seinastu árini: at logtingið veitir styrk til skúlaskeið fyri lærarar, skuresuss sum tað eitur við einum útlendskum orði. 250 kr. vóru veittar seinasta ár og nú hava 25 lærarar verið í Havn í 14 dagar og gingið í honda skúla. Hesar 250 kr. eru so býttar út til teirra. Tað er alla aru vort, at lærarar vilja koma til Havnar og harvið forsoma heimarbeiði, umframt at tey mugu betala 3—4 kr. um dagin í kostarhald, fyri at fáa sær kunnskapir. Hetta sýnir, at her eru fólk ímillum hin føroyska lærarastandin, sum hava hug at halda áfram við teimu málum, sum eru uppi hjá teimum, bæði andilig og ekonomisk. Eg vil mæla til at tingið letur honda sama studning næsta ár. Tað er jú so, at skal nakað gerast, so verður heitt á skúlalærarnar; og tað er rætt nokk: vit mugu roknast við. Tað ræður tí um at halda honda standin uppi, so hann ikki heilt doyr andiliga; ekonomisk hevur hann verið so nær við tað.

A. Samuelsen: Í oina rekkju av árum hava vit latið pening til hesi kursus — hr. Konoy fer at halda maer til góðar, at eg bróki hetta orðið, tað dámar maer betri enn «skeið», sum jú lætt kann misfatast. Í tolm fyrstu árunum merkti man bestrebilsir fyri at fáa nakað burtúr, men eftirhondini sýnist tað sum føroyskir lærarar eru blivnir komplettir, at doma eftir tí sum teir velja at hava til undirvísning fár. Tí annars kundu teir tá ikke funnið uppá at beskeftiga seg við nakað slíkt sum íslenskt mál! Eg skal tó skunda maer altfyri eitt at siga — fyri at einki sovorðið skal bliva niðurskrivað —, at eg aldeilis ikki eri íslenskhatari. Men og siggi sum sagt ikki nakra meining í at velja eitt slíkt undirvísningsemni uttan tað at lærararnir eru fullstendiga komplettir í olhum, sum teir skulu bróka í skúlanum. Hvis so er tinni eg tað natúrligt, at teir leita sær solangt burt sum moguligt eftir einum evni, annars er tað heilt órímiligt. Alíkavæl vil eg fyri mín egna part og á mitt partís vegna anbefala at vit yvirveva, um vit ikki skulu fortseta við hesum tilskoti. Tað kann jú hava sín betýdning, at lærararnir koma saman, tá teir hava ferið. Eg vil tó yvirskja, at lærararnir mugu taka sær akkurt fyri, sum liggur okkum nærmari enn tað, teir seinast hava lingist við. Teirra formaður er jú ein upplinnsamur maður, og vóni, at hann næsta ár finnur uppá nakað meira nyttugt. — Tað var so eitt bestemt spursmál, eg vildi retta til okkara skúlastýri. Tað skal vera borið fram av einum formáandi manni, at teir lærarar, sum hava verið so heldugir at hava tikið lut í hesum kursus fáa full-

vissu fyri at teir verða fyritrekkir við besetilsum av embætum í frantíðini. Eg vil spyrja, um slíkt kann vera framsett við nakrari grund. Nei, tað er aldeilis ikki mín meining at koma við slag og slatri her sum og hoyri, ein tingmaður teskar við síðumann sín. Eg kann ikki teinkja mær, at herarar, sum hava fingið undirvisning í íslenskum, skulu vera betri mentaðir enn aðrir. Hetta er komið til mín frá einum pálitaligum manni, og eg vil biðja skúladirektiónina taka sær av hesum og undirsekja tað. Eg vil retta spurningin til hvønn einkultan skúladirektor, um hvussu hetta hongur saman..

Prósturin: A. Samuelsen hevur borið ein spurning framm til skúladirektiónina, ikki bert til formannin, men til hvønn okkara serstakan: Um tað er nakað í tí, at teimum, sum gingið hava á skúlaskeiði, er givin vón um, at tey betri kunnu fáa embæti enn tey, sum ikki hava gingið. Eg fyri mín part skal hertil svara, at eg ikki havi hoyrt hetta grett fyrr enn nú í hesi stund. Eg havi ikki hoyrt hetta umtalað nakrastaðnis. Og í direktiónini hevur hetta ikki verið á máli. Heldur ikki havi eg nevnt tað við nakran lærara ella lærarinnu. Vit hava í ár havt til umroðu um leingjan av ferinni ella ikki fyri tey sum ganga á námskeiði, annað ikki. Eg havi persónliga ikki havt tað á orði. Tað er sjálvsagt. Eg tali her ikki fyri hinar. Men eg trúgvi, at teir kunnu siga sum eg. Tí betur hevur tað verið so, at tað, sum hevur drigið fólk á skúlaskeið, er nakað annað: tað er ein góður og sterkur hugur at koma saman við starvsfelagar og at læra meiri aftrat tí, sum lært er. A. Samuelsen helt tað vera óhóskandi at geva undirvísning í íslendskum máli. Eg kann ikki geva A. Samuelsen viðhald. Eg haldi tað liggur so ógviliga nær, at okkara herarar fáa kunnugleika í íslendskum. Tí íslendskt mál liggur okkara ikki langt burtur, og vit hava nógv at gera við Ísland og Íslendingar. Tað kann ikki gera lærararnar ringari í føroyskum máli, at teir fáa greiðu á einum so nærskyldum máli. Kanske tað var betri at læra oldnorðisk, men tað hevur eisini góða grund at læra ný-íslendskt, so mikið meiri sum hópur av Føroyingum ár undan ári sokja vestur til Íslands. Vit vita vel, at nógvir skilja íslendskt: men nógvir skilja tað ikki. Kundi ein hjálpt hesum, so var eingin skaði í tí. Eg kundi tugsa mær, at lærararnir sjálvir hovdu hug at læra frá sær, t. d. við at halda kvøldskúlar. Ungir menn, sum fara til Íslands, hovdu lættari fyri at koma á tal við fólkið har um teir dagdu málið framman undan, ikki at tala um, at teir tá kundu skilja íslendskar bøkur betri. Hesin lærdómurin er hjá hesarum okkara eitt supplement til tann lærugreinir, sum teir fyrr hava haft. Teir hava soleiðis fyrr fært føroyskt á ferinkursussi, sagt, rokning o. s. fr. o., og hví ikki so upp ímillum taka okkurt annað. Sum eg veit eru allir lærarnir sum hava gingið hetta skeiðið í ár, fegnir fyri tann undirvísing, sum har er givin teimum, hvør annars kann vera teirra staða viðvíkjandi viðurskiftum Íslands og okkara millum.

Formaðurin: Spørgsmaalet, som A. Samuelsen rettede angaaende, om Lærere, som har gaaet paa Ferickursus, har lettere Adgang til Embeder end de andre Lærere, kan jeg besvare benægtende.

A. Samuelsen: Hin triði skúladirektorurin hevur ikki svarað enn, men eg vóni hann ger tað. Prósturin sigir, at íslendskt á ferinkursussinum kundi vera eitt supplement til tað sum fyrr er lært. Eg kann ikki tugsa mær, at alt lítið skuldi vera liðugt enn. Tað eru nógvir lærarar, sum gott kundu taka eitt ár aftrat í føroyskum, so at teir kundu behandlað føroyskt no kurhunda feilfritt. Tað at menn kann við hesum máta gera Føroyingar meiri kunnugar í íslendskum, tað veit eg ikki. Eg haldi, at Føroyingar, sum fara til Íslands, við at vera eitt ár har, verða betur konir í íslendskum enn teir, sum hava verið á ferinkursussinum. Prósturin helt, at tey vóru fegin sum hovdu verið har. Eg tali ikki fyri nokrum, sum hevur verið á ferinkursussinum, men tí at eg sjálvur hekli, at okkurt máttí ligið nærri at lært eitt íslendskt.

S. P. úr Kongi: Tað er bara sami spurningur, sum hinir í skúladirektiónini hava besvarað, id eisini er settur til mín. Mær kunnugt hevur spurningurin aldri verið fyri í direktiónini. Eg veit ikki hví ein sovorðin spurningur kemur framm nær at menn uppgevur keldu. Viðvíkjandi skúlaskeiði hevur tingmaðurin hildið eina stuttliga ræðu. Eg veit ikki, um hann veit av, at hon var stuttlig. Hann inntekur her eina reint favitskuta støðu, eina tílíka, sum menn ikki kann hava nróðnríkt um. Og so talar hann um upplíming. Tað er eitki serligt upplímmilsi, at vit læra Føroyingar íslendskt. Tað er enga

staðnis í norðlondum, hvar skúlarnir eru so ringir sum her. Men vit hava tó ta serstøðu, at vit skilja øll norðurlanda mál, danskt, norskt og yvirhøvur eisini svenskt mál. Menn hitt íslendska málið standur okkum næst av øllum, tað er tí natúrligt, at Føroyingar skulu læra at fáa kunnleika eisini um hetta málið ikki minst tí, at á Íslandi blóma stórar bókmentir, men um A. Samuelsen kennir nakað til tess, tað veit eg ikki. Tað er eisini praktiskt neyðturviligt, við tað, at o. u. 90 % av okkara skúlabørnum koma at flóta utanfyri Ísland, tá tey verða vaksin. Vit mugu halda tað fram, at íslendskt mál skal vera Føroyingum kunnugt. Og tað er ikki bert tað at Íslendingar eiga stórar nútíðar bókmentir, men teir hava bøkur frá fornari tíð, sum í øllum norðlondum eru nakað heilt fyri seg sjálvan. A. Samuelsen sigir, at vit skulu vera komplettir. Tá ein sigir, at vit skulu vera komplettir, tá er hetta eitt slíkt tos, sum ikki kann svarast til.

A. Samuelsen: Prósturin og amtmaðurin hava svarað nei til mín spurning um lararar, sum hava verið við hetta foriukursus, hava fortrinsrætt til embætir. Hin triðju sigir, at einki tílíkt hevur verið frammi á nøkrum fundi í skúladirektóninni. Men hann skal ikki sleppa so. Eg havi spurt, um tað er úttalað av nøkrum skúladiriktori onkurstaðnis, at tey sum eru við til foriukursus, skulu hava fremsta rætt til embætir. Eg vil einaferð enn spyrja tann valda skúladirektorin, um hann hevur hoyrt, at tað er úttalað ella um hann hevur úttalað tað sjálvur. Eg havi inntrykk av, at mann vil koma sær burtur frá hesum spurninginum. At so skúladirektorurin úr Gotu meinar, at eg við tí, eg havi sagt, havi gjørt meg til talsmann fyri einum fávitskuluum hugsunarhátti, taki eg mær ikki nær. Eg meini, at mín hugsunarháttur er góður, og um so tingmaðurin úr Gotu heldur, at mín hugsunarháttur ikki er komplettur, so vita vit jú allir, at hansara hugsunarháttur er ikki góður. Hann talar um at geyma seg og hann talaði um eelhyr; og veit ikki, um hann ætlar at geyma seg í eellani. Tingmaðurin úr Gotu er jú ógviliga ofta vitfugur her í tinginum, oftast er tað so, at hann sluttleikar sær sjálvum, sjaldan nokrum øðrum, utan teimum ið hava fingið ordra til at grína. Konoy segði, at kunnskapurin hernppi stóð so ógviliga lágt, og at tað serliga skal vera sagt frá danskari síðu: eg vildi gjarna vitað, hvar ið hevir sagt tað. Eg má tvørturimóti framhalda, at forholdini eru ógviliga góð heruppi. Eg meini, at sjálvt um vit ikki eru perfektir í nýíslendskum, kunnu vit hava rættiliga góðar kunnskapir her uppi. Konoy helt tað vera viktugt at læra nýíslandskt, hann helt, at okkara fiskarar kundu fáa líka nógvan kunnleika til nýíslandskt á fiskiferðum undir Íslandi sum lararnir á skúlaskeiðinum í 14 dagar, tað var einki sluttligt í tí, men tað passar væl til tey faktisku forhold. Konoy má vera einigur við mær í, at teir formuftigu føroysku fiskarar, ið hava verið í Íslandi og verið millum Íslendingar, teir duga ivaleyst so nógv Íslandskt sum hesir lararnir læra í 14 dagar. Konoy segði, at tað var nødvendigt at læra íslandskt, tí har „blómaði bókmentir": tað gleðir meg, at Konoy vil halda okkum hesa leið opna, og so ivist eg ikki í at Konoy vil halda okkum vegin opnan til aðrar bókmentir, ið standa okkum nærri og sum blóma ikki minni. Tað er jú eisini ein kend sak, at nebupp mangir av Íslands bestu monnum, táið teir vilja, at blómurnar skulu vera enn vakrari og kennast av fleiri, tá nýta teir danskt mál. Teir menn her í Føroyum, ið tosa so nógv um íslandskar bókmentir, teir kenna óivað oftast ógviligu lítið til teirra, meðan hinrímóti okkara fiskarar, ið flóta uppi undir Íslands strondum, teir kenna íslandskar bókmentir.

S P úr Konoy: Tær upplýsingar, eg gav, máttu verið fult út nógmikið fyri A. Samuelsen, til at fáa greiðu á hesa sak. Eg dugi ikki at fata, hvussu hann kann fáa seg til at siga, at okkara skúlaskapur er góður. Eg meini, at hann ikki er tað samanborin við skúlaskap í øðrum londum, og eg meini, at danskir menn gera okkum ongan órætt, tá teir siga, at skúlaskapurin í Føroyum er rætt primitivur, soleiðis sum m. a. konsulentur í skúlamálum, prof. Larsen hevir úttalað. Eg vildi heldið tað verið eitt undur, um okkara skúlaskapur ikki var langt niðri: vit hava haft nógv verri skúlahús enn aðrastaðni, vit hava haft nógv minni lon, so vit hava unnyst at hava frammihjá arbeiði, o. s. fr. Eg meini, at okkara lorarar skulda haft heiðursprógv fyri tað arbeiði, teir hava gjørt undir so ringum korum; men korini hava verið so fátæklig, at við tí besta vilja og evnum hevir føroyskur skúlaskapur ógoyngiliga kunnað komið upp á hædd við útlendskan. Til A. Samuelsens tos um íslandskt mál og íslandskar bókmentir skal

eg einki skoyta uppí, tað er heilt øvtiqleyst at tjakast við tann mannin um sovorðin evni.

A. Samuelsen: Eg skal aftur spyrja hr. Konoy, um tað er rætt, at hann ongastaðni hevir úttalað seg so, at teir lærarar, ið hava verið á skúlaskeiði, skulu vera tiknir framum hinar, táið embætir skulu besetast. So leingi eg ikki havi fingið svar, trúgvi eg, at hann virkuliga hevir sagt tað. Um prof. Larsen hevir sagt, at okkara skúlaskapur er primitivur, so hevir hann óivað meint tær bygdir, hvar ein lærari hevir tríggjar skúlar ella fleiri, har kann ikki koma so nógv burtur úr skúlagangimum.

S P. úr Konoy: Eg haldi tað vera merkiligt, at ein maður kemur her við, hvat hann hevir hoyrt av leysum tasi, og krevur at fáa álvarligt svar uppá tað. Lat hann koma fram við tí manni, ið skal hava sagt honum hetta; eg haldi, tað er ikki neyðugt at svara uppa leysan slatur.

A. Samuelsen: Eg eri heilt ivaloysur í at tað forholdur sog, sum eg havi sagt; tað eg havi fort fram, er ikki slatur, men frá pálitiligari keldu. Eg eri ikki ítvívl um, at Konoy ikki vil bonokta, tað eg havi sagt.

S P. úr Konoy: Tað er komplett líkagyldugt, hvat A. Samuelsen heldur í hesari sok. Hansara máti at »prógva« uppá, er okkum nógv ov kunnugur.

Sakin varð beind til kirkjukassanevndina.

Brúgv um Kirkjuá.

1. viðgerð.

R. Nielsen: Hetta er ein lítil sok, ið eg her, forstandarskapsins vegna, skal leggja fram fyri tingið. Tað er ein brúgv um kirkjuá, ið forstandarskapið hevir verið noytt til at reparera í vetur og sum vit nú biðja um studning til. Eg skal mæla til, at sakin fer til fíggjarnevndina. Forstandarskapið hevir enn ikki fingið tikið nakað sýn av brúnni, síðmi hon var aftur-gjord, tí kann kanska vera at finnast at: men hetta kann verða nummalt í nevndini.

Sakin varð heind til fíggjarnevndina.

Ójald fyri rannsókn av áum og vatnum.

...

R. Nielsen: Formaðurin í nevndini er tíverri ikki til staðar, av tí at hann er sjúkur, og eg skal so nevndarinnar vegna bera upp á mál, at vit taka eitt lán til gjald av útreishunum hesum máli viðvíkjandi. Vit vóna, at staturin vil taka helft av útreishunum uppá seg, og hinar útreishurnar kunnu so býtast sundur uppá kommununar, í forhold til tað arbeiði, ið er gjort í hvorjari kommunu. Vit kunnu kanska henvenduga amtmannin til at taka eitt bráfongis lán, kassarnir eru fómir og útreishurnar skulu gjaldast. Hvussu skal vera gingið fram við lánunum, kann vera nummalt í nevndini. Eg skal mæla til, at henda sak fer til fíggjarnevndina.

A. Samuelsen: Um eg ikki var forbereiddur upp á alt í hesi sak, hevði hetta komið mær meira enn dátt við. Men ein sak, ið er forbereidd so illa, sum henda frá fyrsta tíð, har kann ein vænta sær alt. Hetta kundi ikki enda væl. Allareiðana nú skulu vit útbetala til undirsøkilsir viðvíkjandi vatnkraft o. u. 20,000 kr. Eg vil spyrja, um vit hava fingið nakað boskeð um, hvat vit kunnu vænta at fáa fyri hesar nógvu pengar, um tað er gjort nakað arbeiði fyri teir, sum standur í rímiligt forhold til hetta stóra bolob? Hvat vit vita er, at vit hava haft 3 ingeniorar ferðandi her í 1½ mánað, men um teir yvirhovur hava gjort nakað, vita vit ikki; eitt er víst og tað er, at forskellig av teimum, sum hava vilja hafa sínar áir undirsoktar, ikki hava fingið tað. Undirsøkilsini, vit hava ynskt, eru ikki fyrilikin eftir okkara ynski; fleiri spurningar standa óbesvaraðir og eg ivist ikki í, at teir blíva við at standa óbesvaraðir eftir at vit hava fingið berednингin eina ferð. Tað allarmest óforsvarliga er tó, at báið kann maður, sum vera skuldi uppá tingsins vegna, gjørdi avtalu við ingeniorin, gloymdi hann at spyrja, hvat tað fór at kosta, ja, hann var ikki eingong so fyrivarin, at hann gjørdi seg kunnugan við tær taxtir, ið galdandi vóru fyri ingeniorhonorarir, so vit kundu hafa tær at rokna eftir. Resultatið fyriliggur nú. Tað er jú aldeilis forskrekkiligt, at vit longu skulu skylda henvið 20,000 kr. til ingeniorin fyri tað simbrið, ið gjort er; tað er aldeilis ómegnligt, at vit kunnu ganga við til at betala hesar pengarnar. Løgtingið má fáa stundir til at undirsokja, hvussu nógv hann hevur roknað sær uppá dagin og hvussu vítt

hansara dagiom standur í forhold til tað, aðrir ingeniorar berokna sær. Formaðurin upplýsir, at hesin maður alla hesir menn hava fingið útbetaldar 5000 kr.; og hopi toir vilja noyast við tað og fara av landinum við tí. Vit kunnu bert siga, at meira fáa teir ikki idag. Tá spursmálið er blivið fyrilagt løgtinginum, so má tað tó vera meiningin, at tingið skal fáa stundir til at undirsokja tað. Ellers kundi útvalgið jú havt ordnað hetta saman við antmannunum. Tað kundi sýnst nógso natúrligt at henvíst hetta spursmál til fossanevndina, men eftir øllum sum fyriliggur, kann tað ikki sigast at vera heldugt; tað er betri at tað fer til budgetútvalgið, so tað kann bliva grundiga granska og rokningin samanlikna við, hvat vit fyrr hava betalt ingeniorum. So er tað spursmálið, um vit skulu upptaka lán til at betala hetta við. Her kunnu menn siga: Ja, her er einki annað at gera; vit eru pliktugir at betala. Tað kann vera, at maðurin, ið hetta hevur haft við at gera, hevur borið seg skoivt at, men tað má løgtingið so sviða fyri! Hetta vildi verið ein so knúsandi kritikkur yvir henda mannin, sum ikki er tilstaðar her ídag, at eg haldi vit skulu bíða, áðrenn vit doma hann. Eg vil tí fyrisláa, at vit goyma sakina til toss hann er atturkomin og kann geva teir upplýsningar, sum eru noyðvendugir. Verður hetta avgjort sum fyrisligið er nú ídag, so vilja vit allir sambandsmenn mótsela okkum at betala og at upptaka lán.

H. C. W.-Tórgarð: Eg ventaði ikki, at henda sakin skuldi koma fram her ídag, eftirsum einki er komið fram gevur tað mær anleiðing til at upplýsa tingmenninar um, at nimitalið í útvalginum ikki hevur vilja gingið við til at góðkenna tey honorarir, her eru kravd. Samanliknað við tað, sum kraft er fyri tílík undirsokilsir av einum øðrum ingeniori, og eisini við teir takstnormir, ið útgivnir eru av tí donsku ingeniorforeiningini, sum altso skuldi verið tað nýggjasta, vit vita um í so máta, standur honda rokningin ikki í nakað forhold. Skal sakin í útvalg, so má hon heldur fara í budgetútvalgið.

R. Nielsen: Hetta nú av sonnum sigast at vera ring lon fyri at havn gjort tað besta man var ístand til. Tá maðurin hast hevur gjort arbeiðið, hann var biðin um, so siga vit nei, vit vilja ikki betala honum! Teir skulu ikki fáast við at skjóta skyldina uppá sjálvstýrismenn, tað er já nevniliga teirra egna forslag, sum vit samvittigheitsfult hava útført, men sum teir nú nokta at betala fyri. Eg eri ikki raskur í dag og haldi meg tí ikki til at fara undir Andrass Sánualsson, sum hann hevur fortjent, men skal noyast við at siga, at tær takstir, ið liggja til grund fyri hesi rokningini, eru lægri enn tær galdandi í Noreg, at hesir menn hava útført eitt stórt arbeiði og at hetta bolobið, um anleggini koma til útførilsi, ikki verður stórt. Allir ingeniorar berokna sær vissar procentir av teim anleggum, teir skulu byggja; koma tey so til útførilsi, verða allar útreiðslur til tey forbereiðandi arbeiðini frátrektar. Eg vil tilráða, at hesir menn sovitt gjørligt ikki fara av landinum og siga, at vit ikki vildu betala teimum. Tað kann løgtingið ónogugligt vera lokent. Eg fyrislái tí, at antmaðurin bemyndigast til at upptaka lán og útbetala monnunum.

A. Samuelsen: Eg má fasthalda mítt forslag. Tað hjálpir ikki at diskutera henda spurningin, soleingi tingmaðurin úr Kirkjubø ikki er tilstaðar. Nei, tað er aldeilis ikki forslagið frá samhandinum, sum her var viðtikið; vit ynsktu eitt almindiligt undirsøkilsi. Var tað viðtikið, so var situatiónin ein heilt annur. Hr. Nielsen sigur, at hesir menn hava beroknað sær lægri honorarir enn tey ið galdandi eru eftir teimum norsku takstunum. Tað er tó beklagiligt, at vit ikki skulu hava tær her, somikið meir, sum vit hava haft eina kommissjón í Noreg — ganska víst var tað bara fann eini maðurin, men hann kundi tó altíð haft sikrað sær eitt exemplar. Ikki eingoug somikið hava vit fingið frá hesi kommissjónini, einki at halda um, bara nøkur orð í einum sokallaðum berettningi! Vit hovdu verið heilt úti av stand til at halonn hetta, viss tað ikki frá aðrari síðu var upplýst, hvussu henda rokningin stendur í forhold til tær takstir sum eru galdandi í einum øðrum landi, sum tó ikki er Noreg. Veit ordforarin, at hesi honorarir eru lægri enn tær norsku takstirnar, so er tað vael bevís fyri, at hann hevur tær takstirnar og so vil hann vael lata okkum siggja tær. Eg havi mermast tað inntrykk av hesi rokning, at hon er skrivað uppá øgjoln, sum teir plaga at siga. Løgtingið kann ikki vera lokennt at ordna hesa sak utan at senda hana í útvalg; og trúgvi ikki, nógvir sjálvstýrismenn vilja standa upp og siga, at henda rokningin er rímulig.

O. Effersøe: Som Medlem af Udvalget vil jeg i Korthed gøre Rede for min Stilling.

Den Mand, der optraadte paa Flertallets Vegne mellem Tingsamlingerne, har ikke handlet rigtigt ifølge den Bemyndigelse, som var ham givet. Han har ikke, som det var ham paalagt, plejet Samraad med Justitsministeriet angaaende Antagelse af en Ingeniør. Jeg mener, at Udvalget burde have forhandlet med Justitsministeriet, men det er ikke blevet gjort. I det hele taget stemmer den Fremgangsmaade, som er bleven benyttet ved Antagelsen af disse Ingeniører, ikke med Tingets Vedtagelse fra ifjor. Jeg kan derfor ikke paatage mig noget Ansvar for at betale Regningen. Vi har paa et Bræt faaet en Regning paa 19,000 kr. Om dette ikke har været til at undgaa, saa vilde jeg, som har været med til at foreslaa Undersøgelsen, ogsaa være med til, at man afholdt disse Udgifter. Men denne Side af Sagen er ikke klar, og jeg vil ikke være med til at ordne dette Spørgsmaal. De Herrer, som har ordnet med Sagen, maa saa selv ordne, hvorledes Beløbet skal betales.

Formaðurin: Amtsrepartitionsfonden skylder allerede 5000 Kr. til Jordebogskassen. Og til denne Undersøgelse, som nu er gjort, ventes en Del forskellige andre Undersøgelser i Aarets Løb. Det er derfor rigtig ogsaa at faa Dækning til de Udgifter, som kommer. Der er fremsat Forslag dels om at Sagen gaar direkte til anden Behandling og dels til Budgetudvalget. Der er naturligvis Enighed om, at Sagen i alle Tilfælde overgaar til anden Behandling.

Sakin verð beind í figgjarnevndina.

Fundur fríggjadag 22. august.

Lóg um bókforing.

2. viðgerð.

J. H. Poulsen: Í august 1912 varð fyrilagd tinginum ein lóg um bókforing fyri Danmørk, har tað í einari grein stendur, at hon gildir ikki fyri Føroyar, men at tað við serligari lóg skal ásetast, hvat av lógini skal galda í Føroyum. Tað var nakað beteinkiligt fyri tingið at taka lógina sum hon var, og hon varð send til keypmannafelagið til ummælis, og tað eru aftur-komnar 2 orkleringar frá felagnum. Teir meina ikki at lógin beinleiðis er nýtandi í Føroyum við tað, at hon gongur væl so vitt í sínum kravi um bókforing í smáum forretningum. Og teir framhalda tað, at t. d. nógvir av teimum, ið driva filialforretning eru ikki so skrivikomir sum honda lóg krevur, og teir hava mest hátt at gera við at taka fiskin, meðani teirra status er virðin uppgjørdur við hjálp frá hovuðsforretningini, og teir vildu tí hava gjørt undantak fyri sumar forretningar. Tingið vildi ikki ganga við til at gera undantøk, men vildi stilla minstukrav til bókforingar og heldur gera krovini so lætt, at allir keypmenn kundu halda somu reglur. Í 1915 varð umboðsmaðurin bíðin um at gera uppskot til lóg um bókforing fyri Føroyar. Tað fyrilá í 1916. Í 1917 varð eingi gjørt við sakina. Í 1918 varð samtykt at biðja ríkisstýrið fremja tingsins uppskot. Nú er tað komið aftur frá ríkisstýrinum, og har er nógv teir finnast at í okkara lógaruppskoti. Teir vilja hava okkum at nevna allar tær forretningar ið skulu føra bókur. Vit hovdu sett lægri botur enn teir fyri brot av lógini; men ríkisstýrið vil hava somu botur ásettar sum í Danmørk. Teir vilja, at lógin formelt skal vera tann danska lógin av 1912, ið kemur at galda her við nokrum fámi broytingum, meðan tað í 1912 var ætlanin, at vit skuldu hava okkara serligu lóg um bókforing. Vit nega halda, at lógin ið vit samtykktu ifjor, var ógvuliga væl skikkað til okkara, og hon var eisini ifjor samtykt á einum fjóði. Vit halda, at tingið hevir mest skil uppá, hvussu lógir beinast eiga at vera í Føroyum, og vit vilja tí mæla tinginum til at senda lógina óbroytta aftur til ríkisstýrið og biðja um, at okkara uppskot má verða lógfest.

O. Effersøe: Som bekendt er der en Bevægelse fremme i Tiden efter saa vidt muligt at tilvejebringe ensartede Love i de forskellige Lande, og særlig i de nordiske Lande har man længe bestræbt sig paa at nærme sig hverandres Lovgivning. Min Opfattelse er, at det i Almindelighed er af Vigtighed, at Lovgivningen paa Færøerne og nede i Danmark bliver saa ensartet som muligt. Det har den Betydning, at det bliver lettere for de Personer, der skal anvende Lovene. Det er dog undertiden nødvendigt at foretage Ændringer, og der er Tilfælde, hvor det er uomgængeligt nødvendigt. Fraset enkelte Smaating, som synes ret uvæsentlige, synes jeg, det er rigtigst, at Lagtinget i denne Sag fastholder sit tidligere Standpunkt.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Broytan í havnareglunskipan fyri Trongisvág.

2. viðgerð.

Nyholm Debess: Frá stýrinum fyri Trongisvágs havn er gjognum amtið sent ein umsókn til justitsministeriið. um at mega hækka havnapeningin. Amtið hevir sent sakina til logtingið. Nú fyrilá eingi um kommunustýrið er samsint við havnastýrinum í hesum máli, og vit sondu so í nevndini bræv til kommunustýrið í Frodbiarsókn, og fingu svar at teir vóru samsintir í hesum. Havnastýrið fyrisló at hækka havnapeningin frá 5 oyr til 10 oyr pr. registarton, og teir framhalda, at tann núverandi havnapeningur er so lágur, at teir kunnu ikki avhalda meira enn tær almindiligu útreislur av honum. Eisini hevir kríggið minka um inntøkurnar. Teir framhalda ymist, sum teir standa fyri at skulu hava útreislur til; teir nevna, at teir skulu skaffa fleiri fortoyningar; teir skulu flyta burtur fleiri vrak, ið gera fortreð fyri nótaknst og øðrum, teir halda tað vildi verið gott, um havnauppsýnsmaðurin hevði haft ein lítlan motorbát, sum hann kundi haft at farið um borð í trolarar og onnur skip og kraft havnapening, tí tað hevir ofta borið á, at trolarar eru komnir og farnir uttan at gjalda nakað. Tann samlaða inntøkan var seinasta ár 1317 Kr. 05 oyr og útreislan 1054 kr. 11 oyr, so hetta er ikki stórt meiru enn tað bulmerar. Nevndin hevir meint, at her hevir verið ansleiðing til at hækka havnapeningin frá 5 til 10 oyr. og skal eg mæla tinginum til at samtykkja hesum. Eg skal tilmæla, at sakin fer til 3. viðgerðar.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Avloka av ynsum forboðum.

2. viðgerð.

Edvo Mortensen: Amtið hevur í skrivilsi av 7. aug. h. á. sent tinginum ein lista yvir tey forboð og kunngerilsir, ið útsend eru eftir lóg av 6. og 7. aug. 1914, og borið tað spursmál fram. um tað ikki er rætt at strika tær reglur, har eru ásettar. Voraldarbardagin er hildin uppat, siglingin til og frá Føroyum er vorðin tolilige fríar. og harvið er grundarlagið fyri fleiri av hesum reglum fallið burt. Nevndin hevur tí hildið tað verið góð grund til at strika ymiskar av hesum reglum eins og gjort er aðrastaðni í verðini. Petroleumsrationeringin er hildin uppat, men sukur- og mjolrationeringin standur enn við. Amtið og millumtinganevndin hava vent sær til ríkisstýrið um skjótast gjorligt at fáa eisini hesa rationering at halda uppat, men hetta standur so nær í sambandi við tey viðurskifti, sum galdandi eru í Danmark, at vit mugu bíða eftir samtykt frá myndigheitunum har. Tað sær út sum mjøl- og sukurrationeringin skjótt fer at falla burt, men vit hava einki svar fingið enn. Keypmenninir hava nú bert til plikt at innbera tølu um beholdningarnar, teir hava av mjoli og sukri, prísirnir skulu kunngerast í krambúðunum; tann reglan eigur at standa við makt, soleingi rationeringin varar. Vit hava verið noydd at forbjóða at fora ynsar vøru til landið; nevndin fyrisær at yvirgeva tað spursmálið til eina millumtinganevnd, nær tað kann vera hóskandi at strika hesi forboðini. Øll broyting var gjørd í jaktlógini, hvar reglurnar um friðan av lomviga vóru broyttar; tað fyrishía vit at strika. Sama halda vit um broytinginia í lóg um garða- og mark frið: hetta spursmálið liggur annars fyri til viðgerð í búnaðarnevndini. Forboðið ímóti at smelta grinda-spik til lýsi fyrisláa vit eisini at strika. Nú er ein sak, sum nevndin ikki hevur kunnað sanneinst um; tað er broytingarnar í grindareglementinum. Eitt minnital (Rasmus Nielasen og Joen Rasmussen) fyrisær heilt at uppheva hesar reglur, eitt annað minnital (Mortensen og Thomsen) fyrisær at uppheva tær uttan fyri Suðroynna. Har gelda sum tingmennir vita, serligar reglur í so máta. Í hinum distriktunum kann jarðalvalurin býtast til kommununrnar eftir rekvisitión, men í Suðroy verður jarðalvalurin lagdur aftrat partalvalinum. Norðanfjarðs hevur reglementið ikki verið hildið at virka gott, og fólk sigast hava verið ógviliga illa hýrd við hesa skipan. Í Suðroy harímóti hevur tað virkað gott, og fólk har ynskja tað at verða standandi við makt. Eitt annað minnital (A. Samuelsen) ynskir hesar reglurnar yvirhøvur at standa við makt fyri fyrst. Nú er tað hin extraordinera reglan, sum var ásett vegna petroleumstrot, at krambúðirnar skulu latast aftur kl. 7; tað er nevndin samsint um at fyrisláa strikað, eftirsum nú ikki er trot uppá petroleum. Men spursmálið um lukkitíð fyri krambúðirnar er jú í seg sjálvt eitt sosialt spursmál, og annars er tí at venda okkum til tær organisatiónir, sum eru

interessaðar í hesum spurningunum, og spyrja tær, um tær vnskja broytingar. Viðvíkjandi útførsilsforboðnum móti innflutdum vørum fyrisláa vit, at tað skal standa við; hvat okkara produktum viðvíkur, er forboðið móti útførslu av lýsi strikað, meðan ullaforboðið stendur við. Flertalið (Mortensen, Poul Nielasen og Thomsen) heldur, at tá tað jú hevur víst seg, at hetta forboð ikki hevur virkað sum tonkt, í tí tað ikki er eydnast at útvega fólki ull, er tað betri at uppheva tað, og at tingið so ístaðin um gjørligt fær lag aina detailleraða ullaskipan. Eitt minnital (J. Rasmussen og A. Samuelsen) vil ikki fyrisláa forboðið uppheva. Maximalprísir hava vit enn fyri eplir og soyðakjøt, men nevndin heldur teir hava virkað so illa, at hon ræður til at strika teir og yvirláta til ta komandi standandi nevnd í samráð við amtmanninum at áseta nýggjar maximalprísir, um tað skuldi víst seg, at produsentarnir eru sinntir til at ganga yvir markið við teirra prísum.

Úrslitið er altso hettar uppskot:

I. Hele Udvalget tilraader:
   A. Amtets Bekendtgørelse af 3. Maj 1917 om Ændring i Jagtloven for Færøerne af 23. April 1897 ophæves.
   B. Amtets Bekendtgørelse af 7. September 1917 om midlertidige Bestemmelser angaaende Hegn- og Markfred ophæves fra den 25. Oktober d. A.
   C. Amtets Bekendtgørelse af 30. Oktober 1916 angaaende Forbud mod Smeltning af Grindespæk til Tran ophæves.
   D. Amtets Bekendtgørelse af 9. Februar 1917 angaaende Indskrænkning i Kjøbmændenes Ret til at udlevere Varer ophæves.
   E. Amtets Bekendtgørelse af 21. September 1918 om Maksimalpriser for Kartofler af forrøsk Avl ophæves.
   F. Amtets Bekendtgørelse af 5. Oktober 1918 om Maksimalpriser for Lamme- og Faarekød m. m. ophæves.

II. A. Grindereglementet:
   I. Et Mindretal (J. Rasmussen og R. Nielasen) tilraader, at Amtets Bekendtgørelse af 17. Aug. 1917 om midlertidig Ændring i Grindereglementet af 14. Juni 1909 ophæves.
   II. Et Mindretal (Mortenson og Thomson) tilraader, at Amtets Bekendtgørelse af 17. August 1917 om midlertidig Ændring i Grindereglementet ophæves, dog undtaget de deri indeholdte Bestemmelser for Sudero Distrikt, der først hæves i September 1920.
   III. Et Mindretal (A. Samuelsen) tilraader, at den midlertidige Ordning bliver staaende ved Magt indtil videre.

B. Et Flertal (Mortensen, R. Nielasen og Thomsen) tilraader, at Amtets Bekendtgørelse af 11. September 1918 om Forbud mod Udførsel af Uld ophæves.

Eg vil mæla til, at alt tingið samtykkir teim uppskotum, sum øll nevndin er samsint um, og at vit strika útførsilsforboðið móti ull. Eisini vil eg biðja tingið samtykkja í at strika tað extraordinera grinda reglementið undantikið Suðroynna. Nakað principielt kann eingin hava ímóti tí, at jarðahvalurin fellur burt. Tað kann tykjast undarligt, at eitt einkult distrikt skal inntaka eina slíka serstøðu, men vit hava nú einaferð latið Suðroynna hava eina serstøðu her, grundað uppá, at tað var eitt alment ynski hjá fólkinum í Suðroy. Løgtingið vil tí neyvan við makt ganga ímóti tí ynskinum, serliga tá jarðamonnini í Suðroy sjálvir vnskja tað at vera, so sum er fyri fyrst. Eg vil mæla til at stemma fyri okkara uppskoti.

R. Nielasen: Eg havi saman við Joen Rasmussen fyrisligið at hevja allar hesar broytingarnar í grindareglementinum, tí teir hava ikki verið praktiseraðir eftir ynski. Hvatið Suðroynni viðvíkur, liggur einki her fra hándnunum um at teir vilja geva jarðahvalin til tann almenna mannin, - - tí eftir teim prísum, sum verið hava í Suðroy við tey seinastu grindadrápini, má tað nærmast kallast ein gáva. Løgtingið hevur tí einki at halda seg til hvat ið hesum viðvíkur.

S. P. av Kanoy: Tó at hetta nevndarálitið er sera ringt at lesa havi eg lingið fatað í nakað av tí. Tað er møguligt, at vit eiga at halda uppat við handlinum í Tinganesi, tá rationering av mjøl og sukri hættur uppat, men dóreun eg fylgi hesi fyritoku til gravar, vil eg fegin geva hesum nakur orð uppá vegin. Eg haldi ikki tað er heint ótanvíðurt og utan umhugsan at halda uppat, tí hesin tankin: at hitt offentliga kontrollerar tær mest nevðturviligu, neyðsynjarvørur, sum menniskjur skulu bríka,

ber umsorgan fyri at tær eru tilstaðar og til rímiligar prísir, er so opinbera góður, at tað nokk er vert at ofra bæði tíð og umhugsan uppá, at vit ikki lata hesar vorur í hendurnar á einkultum monnum til at spekulera í. Tað var nakað, sum vit kundu ofra ein tanka, at vit ikki lata vørur sum t. d. mjøl, sukur, grýn, salt til spekulatión, so at einhvør kann dýrka tær. Tílikar vørur eiga ikki at kosta brúkarunum meiri enn tær noyðast at kosta. Viðurskiftini hava verið so, at fólk higartil ikki hevur kunnað taka seg saman í forbrúksforeiningar, sum teir hava gjørt aðrastaðnis. Tingið eigur ikki utan víðari at sleppa tí góða anboð, sum tað hevur í amtshandlinum úr hondum. Og eg vóni at tann nevnd sum fær við hesa sak at gera, vil nýta tær royndir sum eru gjørdar í hesum verki.

J. Rasmussen: Eg havi eisini verið limur av hesi nevnd og eri samsintur í teimi flestu lutum. Men vit í minnitalinum skiljast við fleirtalið í grindaordningini og ullaordningini. Eg eri ímóti, at man býtir grind, so at allir Føroyingar skulu vera við. Hendan ordningin hevur ikki virkað tilfriðsstillandi, og og vil ráða til, at mann upphevar hana. Viðvíkjandi ullini halda vit í minnitalinum, at teir sum uttfora ull, eiga at fáa loyvi til at útføra tað gomlu ullina, men ellars at antið kann geva dispensatión. Eg vóni, at vit her halda fast við tann ordning sum er.

O. Effersøe: Der blev af Ordføreren talt om, at Bestemmelserne om Hegn- og Markfred burde ophæves. Men der er vel den Opfattelse hos alle her i Tinget, at der tiltrænges Bestemmelser paa dette Omraade. Jeg mener, at dette er en Opgave, som paahviler Landbokommissionen. Der synes at være Enighed om, at man maa opheve Maksimalpriserne. Ja, naar man ser hen til, hvorledes de har virket, kan det synes meget naturligt. De har ikke ført til noget heldigt Resultat, og det skyldes, at Tinget ifjor ikke indtog et kraftigt og formaalstjenligt Standpunkt. Jeg vil dog anbefale Vareudvalget eller det Udvalg, som bliver nedsat i denne Sag, at fastsætte Maksimalpriser, om det viser sig, at Priserne paa Madvarer vil blive skruede op. Med Hensyn til Grindereglementet er jeg enig i, at de nuværende Regler for Suderø skal staa ved Magt. Suderø er et afgrænset Grindedistrikt, som ikke har noget med andre Grindedistrikter at gøre, og der er dek ikke vanskeligt at praktisere den Ordning, at alle Beboerne faar deres Andel af Fangsten. Her nord paa er det anderledes. Det er her særlig Vaago, hvor Grindefangsten indfinder sig, og herfra er det vanskeligt at fordele Fangsten til alle Øerne her nord paa. Det er i det hele taget vanskeligt at tilvejebringe en hensigtsmæssig Fordeling her. Endskønt jeg ønsker faelles Bestemmelser, er jeg dog ikke bange for at fravige almindelige Regler. R. Niclasen spørger, hvad Bønderne paa Suderø siger til at give Grindehvalen bort. For det første bliver Jordehvalen ikke givet bort, og dernæst ser Bønderne paa Suderø ikke ensidigt paa Sagen. Maaske er Bønderne paa Suderø mere beskedne end her nord paa og vil, at ogsaa andre Mennesker skal faa det godt. Konoy vilde sige nogle Ord, før hele Sagen vedrørende Amtshandelen blev begravet. Jeg haaber, at vi faar Sagen til bredlig Behandling, saa at der for mig og andre ogsaa bliver Anledning til at sige nogle Ord. Vedrørende Fortsættelse af Amtshandelen, saa er der den Forskel, at før var Monopolhandelen Skyld i alt ondt. Den var frygtelig, er der bleven fortalt. Nu ser det ud til, at den Tid, som nu er gaaet, i nogen Grad har revideret denne Opfattelse. Jeg personlig mener, at Frihandel i sin Almindelighed og under normale Forhold bør foretrækkes. Men samtidig maa vi være klare over, at naar Forholdene bliver ekstraordinære, saa er der Grund til at gøre Indgreb i denne Handel. Hvorvidt det er Tilfældet i Øjeblikket, ved jeg ikke. Det maa man overveje. Saaledes som Situationen er, maa man nærmest tænke paa at afvikle Amtshandelen.

Formaðurin: Dømi Sag, sum gaar ut paa, at Tinget træffer Beslutning, skal kun underkastes to Behandlinger. Dette fremkommer kun som Svar paa en Forespørgsel.

O. Effersøe: Naar der fremsættes et andet Ønske fra nogen af Tingets Medlemmer, plejer Formanden at efterkomme det. Jeg vil da fremsætte Ønske om, at vi faar Sagen til 3. Behandling.

Edv. Mortensen: Spurningurin, um amtskommunan skal halda fram við verulandlinum ella ikki, liggur slett ikki fyri í dag, men tað vil koma til umrøðu, táið landshandilin kemur til viðgerðar her á tingi. Eg skilji heldur ikki sýslumanni Effersøe, hvat hann meinar í hesari sok, men eg skal ikki tala nærra um hetta

mál í dag, men bíða, til tað kemur til umroðu á tingi. Men sjálvt um amtshandilin heldur uppat við handlinum við mjoli og sukri, so hava vit lougn lingið skrivilsi frá ministeriinum, ið páleggur amtsmonnum at kontrollera prísin á mjoli og sukri, um nevðugt við maximalprísi. Konoy segði, at hann vildi biðja milluntinganevndina ansa eftir, at amtshandilin ikki varð avviklaður uttanvíðari. Tað kann millum tinganevndin einki gera við. Amtshandilin var ein bráfengis fyritoka, og má tí avviklast, um ikki ein logtingssamtykt kemur at fyriliggja, um tað nótsetta. Jógvan Rasmusson talaði um ullina, at hon ikki kundi framskaffast; nei, tað kann hon ikki eftir tí, sum samtykt er í forboðinum móti útforsil; men um minnitalið vil fraintvinga ullina, má tað koma við einum positivum uppskoti harum. Sýslumaður Effersøe talaði um garða- og markfrið; tað kann vorunevndin ikki taka upp til endiliga avgerð, tí tann spurningur er til umroðu í einari heilt aðrari nevnd. Nakað annað var, at vit kundu roynt at fingið hesi bráfengis bestemmilsir um garða- og markfrið at verið galdandi eitt ár enn, um nevndin ikki íár kann koma við einum uppskoti til ein endiligan loysning.

Formaðurin: Til Hr. Konoy vil jeg sige det samme som Hr. Mortensen sagde, at Ministeriet har anmodet Amtmanden om at kontrollere Priserne paa Mel og Sukker, og om nødvendigt regulere dem efter visse bestemte Regler. Disse vil blive stillet til Vareudvalgets Kundskab.

R. Nielasen: Eg havi ikki nógv at siga, men táið talað verður um grind, verður blóðið heitt, plaga tey at taka til. Effersøe segði, at Suðuroyingar vóru fornoyðaðir við ordningina av jardalivelsarettindunum; tað kann vera, at onkur hevir verið fornoyðaður har suðuri. Effersøe sjálvur var tað ikki, hann vildi hava broytt hetta. Effersøes partur skuldi seljast fyri 12 kr. skinnið, hann fekk grind í staðin. Tað kann vera, at bondurnir í Famjin vóru fornoyaðir; teir løvdu grindina á staðnum, men hinir ið skuldu fara hana, teir kundu hava nakað at fýlast at. Eg kann ikki halda við Effersøe í, at skipanin er góð.

O. Effersøe: Min Bemærkning om Amtshandelen var foranlediget af Hr. Konoy, og jeg skal ikke have noget imod at frafalde Diskussionen herom i Dag, da det bliver stillet Tinget i Udsigt, at vi faar Lejlighed til at tultale os herom en anden Dag. Spørgsmaalet om Hegn og Markfred bør tages op til grundig Overvejelse, det er et vigtigt Spørgsmaal, hvis Losning ikke kan vente. Mine Udtalelser om Grind refererer sig til Jordelivaden og hvorledes Befolkningen stiller sig til den nuværende Ordning. Og jeg har fremført, at paa Suderø har man gennemgaaende været fornøjet. R. Nielasen har i dette Tilfælde som saa ofte for ikke vidst rigtig Besked med, hvad han talte om, han har været, hvad man med et vulgært Udtryk kalder vild paa Kareten. Jeg ogsaa mig ellers tydelig nok, men jeg skal til Hr. R. Nielasens Paastand bemærke, at jeg har ikke ønsket nogen Forandring af den Slags, han omtalte, og jeg har ikke stemt for en Ændring paa det Omraade. Og Hr. R. Nielasen burde vide, at jeg er slet ikke smaalig paa det økonomiske Omraade. Hr. R. Nielasen har taget grundigt fejl.

Joen Poulsen: Jeg kan være enig med Udvalget i alle de Punkter, hvor man vil ophæve Handelen. Men naar man saa betragter de andre Punkter, hvor der ikke i Udvalget er Enighed om Ophævelse, saa er det et Spørgsmaal, om ikke snart Grundlaget for alle disse Punkter falder væk. Naar Amtet har kunnet foretage alle disse Forbud og Indskrænkninger i det private Initiativ, hvorpaa den offentlige Varehandel beror, saa grunder det sig paa en Lov af saa vidt jeg erindrer 1914. Men jeg tænker mig nu, at den Lov maaske snart bliver ophævet. Hvis man derfor tænker sig, at denne Ordning af Grindefangsten skal blive varende, maa man faa et nyt Grindereglement. Grundlaget for den nuværende Ordning kan vi risikere snart bliver ophævet.

P. Nielsen: Tað hevur nú verið talað um, hvussu skipast skal tá vit skulu halda uppat við amtshandlinum. Nú er veraldarbardagin at enda; men enn eru vit ikki komin inn í normalar tíðir og hava ikki útsikt til at koma tað í langa tíð. Føroyafólk kann enn rokna við at gjalda teir somu prísir sum nú: kannske eitt sindur meir, kannske eitt sindur minni. Meðan bardagin hevur staðið hava vit haft góðar tíðir í Føroyum, men vit hava onga vissu nn, at tíðirnar framdeilis verða góðar. Men teir fegnu prísirnar koma vit at líta; tí er vert at hugsa, um hvat tað offentliga kann gera fyri at halda prísirnar so lágar sum gjørligt. Tí er tað ikki nakar ótilhalandi tanki, at amtskommunnan tekur salt, kol og petroleum undir seg. Salt eru allir íbúgvarar í Føroyum interesseraðir í at fáa so bíligt sum møguligt. At fáa kol bíligt hevur eisini stórt at týða fyri nógv fólk. Nú kann man ikki vera blindur fyri, at tað er vanskiligt at fáa ilag í tann økonomiska spurningin. Men er sakin góð, skal man ikki óttast. Vanskiligheitirnar eru til fyri at tær skulu yvirvinnast. Eg haldi, at tað offentliga vil kunna inn keypa bíligari og altso halda bíligari prísir enn um mann lotur keypmonnunar fáa loyvi at bestilla og handla sum fyrr. Mann má minnast, hvat ætlanin var til, at amtskommunan fók varuforsýningina. Tað var tí teir føroysku keypmannair erkendu, at teir ikki kundu forsýna Føroyar við teim neyðturviligu vørum. Eg haldi, at

man ikke skal vera so raddur at ganga keypmonnunum eitt sindur nær. Meina vit, at amtskommunuman við einum slíkum handli kann verða til frama fyri Føroyar, so eiga vit ikki at betoinkja okkum uppá at seta slíka fyritoku í verk. Annars má og siga, at teir menn, sum árini herfyri hava kritisera vorunevndina, sum tá var, so ógviliga sterkt, nú mugu siggja, at tað er stórur munur millum at kritisera aðrar og sjálvir at standa fyri kritikk. Um og var limur av fleirtalinum, vildi eg ganga við, at tað er skeivt atborið, og eg vil taka skyldina. Men teir siga, at antin amtmaðurin ella minnifalið eigir skyldina. Um amtmaðurin er slíkur despotur og ikki tekur hensyn til hinar, so er tað rætt, at teir siga tað. Men eg trúgvi, at amtmaðurin hevur verið ógviliga lagaligur og hevur tikið hensyn til teirra transaktiónir. Tað er ómanduligt av hesum mønnum at kveita ansvarið frá sær, yvir á ein einstakan mann ella á minnifalið. Eg sigi, at eg vil ikki doma hesar menn, men sum Kristian hin Annar segði um Torben Oxa: hansara geruingar doma hann, og soleidis við sjálvstýrismonnunum.

J. Patursson: Tað var ein forútseting, táið vit, ið vóru í minnitali, arbeiddu fyri at fáa ræðið í vorulandlinum, at vit, táið vit kom í Heirtal, skuldu fáa alt unnvar. Men tað vísti seg í mai mánaði, at tað kundu vit ikki fáa, tann forútseting glapp, og vit komu ongantíð at ráða.

Poul Nielsen: Eg skal takka fyri henda upplýsing. Tað er altso nú konstaterað, at tað skyldast justitsministarunum, at sjálvstýrismenn hava givið ansvarið frá sær.

Nyholm Debess: Um tann seinasti talari vil lesa, hvat fiundarbókin sigur, vil hann fáa eitt annað bíleti av hesari sak.

R. Nielsen: Eg havi sitið og hoyrt nógv og fingið nógv høgg, men tey hava ikki bitið so stórvegis á meg. Poul Nielsen sagði nógv um handilin, sum og kundi funnist at, men hansara óttatilsir skyldast vel hansara ókunnskap til handil. Logtingið kravdi, at keypmenninir skuldu forsýna Føroyar við vorum, tað kundu teir, men logtingið kravdi eitt meira, at teir skuldu garantera forsýningina. Tað einasti, eg havi sæð Dimmalætting, Poul Nielsens blað, kritisera vorulandilin fyri, er byggmjølið. Tað hevir verið júkað upp í samman, og nú tá ið liðugt er at selja mjølið, koma ferð eftir ferð fyrispurningar frá bygdunum, um ikki meira er eftir av hasum góða mjøli. At mjølið kom í so ringt orð, kom av, at ein keypmaður í Havn fekk í fyrsbuni nakrar spiltar sekkir; hann loypti eina slíka golu í um alla Havnina, og haðani spreiddust tíðindini um hetta spilta mjøl út um allar Føroyar, so bygdamenn illa tordu at taka ímóti tí. Men so, táið mjølið kom út á bygdirnar og menn sóu, at mjølið var gott, tá vildu allir fegnir hava mjølið. So var tað hr. Effersøe. Mær dámar altíð væl táið mín ærnadi síðumaður talar, tí eg veit, at hann gjarna vil hava eina sakliga diskussión, og eg foldi meg eitt sindur stoltan, tá hann segði, at tey tol, eg hevði lisið upp, nokk skuldu passa. Tværímóti segði hann, at eg hevði ikki svarað A. Sámalssyni tilfredsstillandi. Nei, tað vænti eg heldur ikki, at Effersøe kann meina, so leingi hann og sambandsmenn yvirhovur standa so skarpt yvirfyri ollum, sum sjálvstýrismenn gera, men eg vænti, at tann tíð ikki er langt burtur, tá bæði Effersøe og Andrass Sámalsson vilja halda tað vera púra beint, sum sjálvstýrismenn nú halda. Effersøe spurdi meg, hvussu tað gekk við sambandinum millum Amerika, Ísland og Føroyar. Ja, vit hava já fingið nakað mjøl úr Amerika. Effersøe sigir, at tað er ógviliga dýrt; eg haldi tað nú ikki vera so dýrt, tí tað er ógviliga gott mjøl. Hvat ið annars sambandinum við Amerika og Ísland viðvíkir, so hava vit netupp nú Heiri Íslendingar, ið ferðast Føroyar rund og selja nógva voru fyri handilshús í Íslandi, og tað er alt amerikanskar vorur. Tann talan, ið Andrass Sámalsson helt, var ógviliga agitatorisk, og hann royndi at fáa hana sa agitatoriska sum møguligt, tí í sínum hjarta mundi hann meina nakað heilt annað, og eg vil gagna mínum landi, við ikki at spilla tingsins kostbaru tíð við at svara uppá alt. Hann segði, at tá teir ráddu, var ómøguligt at fáa voru. Ja, tað sigir mann í 1919, men vit sum livdu í 1914, vit minnast so væl, at hovdu vit tá lagt vegin til Amerika, so hovdu vit nú haft eitt yvirskot uppá kanska einar tvær milliónir, tí tá vóru góð likindi til at fáa voru hadani, og tá var hon bílig. Men tey likindini eru heilt øðrvísi nú. Og skal Andrass ikki sleppa frá, at hann var ein av hovudsmonnunum til at forða fyri at fara til Amerika og at vit tí hava lagt hópin av peningum við at keypa ovdýrar vorur. A. Sámalsson segði, at vit hovdu tvingað Føroyingar til at keypa okkara vorur, vit hava roynt at regulera prísirnar so vítt møguligt, og tað hevir ongin annar máti

verið. Efferson segði, at hatta leið, ið vit hava sett tit uppá, skyldast sjálvstýrinum: tað passar ikki: tað er te, sum var rokvirnað av sambandinum, meðan tað enn var við fleirtali. Tað var upplagrað í Reykjavík í mars mánað 1918 og kom ikki her fyrr enn um heysfið, við einum skipi ið at Herbert May, nei, tað var við einum odrum, tað var vist Francis Hyde. Táið tað verður sagt, at sjálvstýrismenn hava skyldina fyri hvat hendi við Herbert May, so var tað menn, ið langt frá vóru sjálvstýrismenn, ið stóðu fyri tí keypi, tað var konsul Evensen, konsul Jens Olsen, konsul Lützen og umboðsmaðurin Rytter, og eingin av teimum kann roknast fyri sjálvstýrismann. — So er tað monopolhandilin, sum Debess heldur uppá: ju, tað kann jú vera, at vit kunnu fáa nakran pening til logtingið við monopol uppá vissar vørur, men so má okkara lóggevan broytast fyrst, og tað kann ikki sigast at liggja fyri nú; í hvussu er er tað ikki nakað ið uppfekur núnar tankar stórvegis; tað kann jú vera, at eg eri meira frisinnaður handilsmaður. Men spurningurin kann jú yvirvegast. — Eg tilmælki fáðni, at beina rokinskapin til fíggjarnevndina.

Th. M. Strøm: Tað hevir verið sagt, at nú kríggið er hildið uppat, mega vit eisini sum skjótast geva uppat við logtingsins vanhandli. Men eftir hvat ið vit frætta utan úr verðini, so eru tíðirnar um óvgaligu kritiskar. Eg má halda tað sama sum tingmaðurin Nyholm Debess, at vit í hvussu er ikki mega geva handilin frá okkum við koli, salti og petroleum. Eg eri av sama meining sum Nyholm Debess, at vit eiga at halda uppá offentligan handil við koli, salti og petroleum. Andrass Samuelsson meinar, at vit sum skjótast eiga at halda uppat og selja út við auktión, men her er ein spurningur, eg ikki eri reidiliga klárur yvir; fer tað ikki ein yvireinskomstur millum keypmannsforeiningina og umstandilin um at keypmennirnir skulu yvirtaka beholdningin? Møguligvís kann Andrass Samuelsson greiða frá hesum; hann var jú sjálvur limur av vørunevndini, tá hesin yvireinskomstur kom ístand.

A. Samuelsen: Millum teir bemerkningar og gjordi av fyrsta tíð, gloymdi eg at peika uppá tann mun, ið er millum roknskapin fár og ifjor, í tí at passivini eru nógv minni specificeraði nú. Har stendur soleiðis einki um rentur: í bilagunum eru rentur ikki umtaladar. Vil tað siga, at engar rentur eru svaraðar seinasta ár? Softall hevur tað stóran betýðning fyri yvirskotið. Sjálvt statskassin skal jú hava rentur av sínum pengum; tað er ein stórur postur. — Til tingmannin í Hvan, hr. Nielsen, sum argumenteraði við tí, at keypmennirnir í sínari tíð ikki turdu pátaka sær at forsýna landið við vørum og brúkar tað sum argument fyri, at vit skulu fortsetta handilin, vil eg siga, at feirra orkbering var givin útfrá forútsetningum, sum nú ikki eru tilstaðar, nemliga at tá var kríggstilstandur. Nú hovdu teir ikki betinkt seg uppá tað. Tær umstøðugheitir, ið tá vóru eru so hált ólíkar teimum, vit liva undir nú. So segði tingmaðurin úr Kirkjubø, at tá kritikur var rættaður móti sjálvstýrispartíinum, so mátti tað vera útfrá teim forútsetningum, at teir hovdu alt ansvar, men tað hava teir ongatíð fingið. Eg minnist ikki, at nakar í sínari tíð hevndi nakað um frá teirra síðu, at vit ikki hovdu alt ansvarið. Tvertímóti. Eg má fast og bestemt halda uppá, at teir hava heila ansvarið, og vil ikki kníja tað allarminsta av tí: tað er eingin meining í at leggja nakað av ansvarinum á minnitalið ella umboðsmannin, utan tað skuldi verið so, at teir nakrantíð hovdu ynskt nakað útført, sum umboðsmaðurin ikki hevur viljað gjort. Eg minnist einki slíkt tilfeldi, hvar vit hovdu viðtikið nakað og umboðsmaðurin ikki vildi útføra tað. Eg haldi fast uppá, at forholdið er akkurat tað sama nú. Eftir logtingsbeshlutaningunum er tað útvalgið, sum hevur ansvarið. Ja, sjálvt um tað skuldi vist seg, at umboðsmaðurin hevði forsomt at útføra nakað, sum teir hovdu viðtikið, so haldi eg tó fast uppá, at tað er fleirtalið, sum hevur ansvarið. Í almindiligheit vilja teir kunna síggja, um teirra beshlutaningar eru útførdir ella ikki. Eg kann heldur ikki innrenna, at justitsmálaráðið hevur nakað, tí hann ikki hevur viljað gjøgnumfort tað ordning, teir fyrisló. Hetta er ein rein umkommunal fyritoka. Tað er væl ikki so galið, at teir í hesi tíðini, hvar teir predika um, at vit skulu hava sjálvstýri, vera eitt ríki fyri okkum sjálvar, eitt kongaríki norsagt, hava sett okkara umboðsmannafa sjálvstýri yvir stýr? Hr. Patursson sigur, at so er tað eisini peningarnir frá statskassanum, vit ongu taka hensýn til. Ja, tað meini eg eisini. Tað er heilt naturligt, at teir, tá teir lata okkum fáa hesi miltión-fáðini, forlanga, at teirra tillidsmaður, umboðsmaðurin, er uppi í til at forvalta teir. Agitatiónin ifjor gekk jú millum annað út uppá, at tær 4 milliónirnar vóru burtur og tað hevur kanska gjort ministeriið bangið, so teir hava sett umboðsmannin at passa uppá tær. Tað er alt so ikki sam-

landspartíið, sum hevur gjørt tað neyðvendugt fyri ministaran at seta okkum undir formyndarskap, men sjálvstýrismenn sjálvir við tvirra óforsvarligu agitatión. -- So var talan um tað ringa mjolið. Rasmus Nielasen sigur, at fólk vóru so forharmað yvir, at tað var uppi, hetta mjolið, sum tey ikki hohovdu at bera til hús, tí tað gekk sjálvt. Tað er stuttligt, at fólk hevur fragd av at fortelja Rasmus Nielasen slíkt og fáa hann at trúgva uppá tað, men viss hann lýr, at hann kann fáa lagtingið at trúgva tí, so fer hann skeivur. Og tað er ikki stuttligt, at hann skal vilja lata slíkt niðurskriva og prenta í lagtingstíðindi og lata fólk betala fyri tað -- tað er ovgalið. -- Nyholm Dobess brikslar mær mína agitatórisku tónu. Nei, eg havi aldri verið so langt burt frá agitatión sum ídag, men hon kundi verið grund til at agitera. — Eg havi aldri sum Rasmus Nielasen leggur mær í munnin, sagt, at vit fingu varur til landið, tó tað var ómeguligt at fáa varur. Vit hava ikki prosferað tað ómoguliga, men vanskuligheitir tá vóru mangar ferðir størri enn nú. Hann sigur eisini, at tað var mín skyld, at Amerikakeypini hildu uppat. Eg havi eitt brev frá Rasm. Nielasen, hvar hann takkar mær fyri so nógv, eg havi gjort fyri at fáa fart; tað er mín skyld, at hetta kom ílag. Seinri sigur hann meg einki hava gjørt ella enntá forða fyri keypinum frá Amerika, men tá var eg í Kjøpinhavn og sat ikki í varunevndini og kundi tí einki gera. Dernóti sótu bæði Rasm. Nielasen og Jóannes Patursson í varuútvalginum og vóru við til at fáa varur í hópatali frá Kjøpinhavn; vit minnast enn við látur í huga, tá teir skuldu bestilla niðurfyri til tær svongu fiðirnar av korni og tessvegna bestiltu -- 20 tons! Sjálvsagt tók amtmaðurin, ið vissti, hvussu lítið hetta fór at forsláa, og bestilti nógv meir, men tá var hann deildur av lingnamunum í Kirkjubø og Rasmus Nielasen, tí hann hevði bestilt fornógv! Grundin til, at hann ikki gjordi nakað við Ameriku, var tann, at tað í tíðarskeiðinum 1914 -15 visti seg, at mann stóð seg betur við at keypa úr Leith ella Keypmannahavn. Og Grundin til, at vit ikki seinni keyptu í Amerika, var ikki hjá mær, men hjá J. Patursson og R. Nielasen. Tað stendur ómótsagt, at teir lótu spurningin um at keypa varur úr Amerika falla, tí tað leysti seg ikki. R. Nielasen sigir um teið, at tað er sambandsté. Men viðtøkan um at keypa teið er gjord á einum tíðspunkti, tá nuverandi fleirtalið hevði fleirtal í nevndini; teir kundu altso hava forðað fyri tí. Hvorjir keypmenn av teimum, sum hovdu bestilt vorur við »Herbert Maye vóru sambandsmenn og hvorjir ið vóru sjálvstýrismenn -- tann spurningin kann mann væl ikki geva seg tíl at undirsokja. Strøm spurdi, um meiningin hjá mær var, at vit skuldu selja nakað av vorunum við auksjón. Eg havi ikki sagt, at vit skulu selja allan beholdningin við auksjón. Eg nevndi tað forpliktilsi, sum keypmenninir hava. Tað forpliktilsi kann tó ikki strekkja so víðt, at vit kunnu plikta teir til at keypa varur, sum eru spiltar ella minni góðar av tí, at vit hava goymt tær ov leingi. Tann vara, sum ikki er kurant, haldi eg, at vit skulu selja við auksjón.

O. Effersøe: Jeg skal først rette en Bemærkning til Debess vedrørende at forkastte Amtshandelen. Hvor mener Debess, at man eventuelt kan skaffe Plads til en saadan Handel. Jeg giver R. Nielsen Ret i, at vi to kan diskutere uden at blive Uventer; men det er ogsaa det hele. Jeg spurgte, hvorledes det forholdt sig med den saa stærkt opreklamerede Amtshandel. Han sagde, at her var Handelsrejsende, som optog Bestillinger fra Amerika. Dernest sagde R. Nielsen, at om man havde fulgt ham, vilde Amtshandelen kunne fortjene to Millioner. Hvorfor ikke sige ti Millioner. Hvad enten der siges en eller ti Millioner er det lige ugrundet. Det er ikke blevet oplyst, at der er noget Fundament for det, som R. Nielsen siger. Hovedsagen er, at man grundig har taget fejl med Hensyn til Betydningen af Amerikahandelen. Hvor er alle Amerikadamperne, som man kunde vente sig efter de store Ord. Medens det er gaaet let med Nejlsdsen fra Kobenhavn, hur det været smaat med Amerikadamperne. Men i Fremtiden, siger man. Ja, det Spørgsmaal lader sig diskutere. Da jeg rejste til Danmark ifjor, talte jeg med islandske Kobmænd om, hvad man paa Island mente om Amerikaspørgsmaalet. Der blev svaret, at den almindelige Opfattelse var, at Amerikahandelen vil høre helt op uden for enkelte Artikler. Teen er et meget svagt Punkt for Selvstyrepartiet. Men det er rigtigt, at denne Te blev indkøbt til Amtskommunen, da Selvstyrepartiet var i Flertal saavel i Tinget som i Udvalget. R. Nielsen siger, at det var Sambandskobmændene og Ryttere, som foretog dette. Det var Kobmandsforeningen. I denne Forening er der Sambandsmænd, men der er vel ogsaa Selvstyremænd, blandt andet R. Nielsen, som maaske oven i Kobet er i Bestyrelsen

Forskellen mellem mig og de Herrer er ikke, at jeg mener, at man aldrig burde have købt Varer i Amerika og aldrig bør gøre det. Mit Standpunkt er dette, at man under Krigen burde have opkøbt nødvendige Artikler, hvor de kunde faas, og der, hvor de kunde faas billigst. Jeg mente, at man gjorde klogt i at undersøge, om man kunde faa Varer fra Amerika, fordi det saa ud til, at der kunde blive lukket for København og Leith. Senere kom det dog til Rette. Og Fragterne mellem København- Færøerne blev meget billige, saa at det ikke kunde betale sig i nævneværdig Grad at købe Varer fra Amerika. Nu da Fragterne fra København er steget saa meget, saa kunde der være Grund til at vende sig til Amerika, men nu mærker vi ikke noget dertil.

P. Nielsen: Viðvíkjandi hin síðsta spurningin vil eg halda frumm, at Føroyar skulu søkja marknað har sum best og bíligast er. Og er tað bíligast í Amerika, so meini eg, at vit skulu fara hagar. Viðvíkjandi sambandi millum Keypmannahavn og Føroyar er tað hvørjum manni kunnugt, at tað hevur latið nógv eftir at ynskja undir krínum. Viðvíkjandi spurningi um keypmenninar og vøruhandilin, so hildu keypmenn seg í 1914 ikki vera føran fyri at forsyrgja Føroyum varur. Nú vil eg trúgva, at keypmenninir vilja yvirtaka hendan handilin, men hetta má síggjast uppá tað sum teir góvu til kennar í 1914. Eg eri annars fegin, at forhandlingsprotokollin er afturkomin og ikki bleiv burtur við alla.

N. Debess: Effersøe sigir, at fyrverandi amtmaður Rytter einki hevði at gera við tey køyp av vørum, sum keypmenninir høvdu gjørt í Amerika. Men eg var einaferð til fund í vørunevndini, tá hetta var á tali. Vit spurdu tá fyrverandi amtmann Rytter, hvussu keypið var ordnað. Tað framgekk tá, at keypmannafelagið hevði brúkt Rytter sum nilfummann. So spurdi eg, hvor ið greitt hevði telegrammútreiðslurnar til hetta. So svaraði Rytter, at hetta var smáting, sum man ikki talaði um, og at útreiðslurnar vóru greiddar av vøruforsýningini. Rytter var soleiðis ikki utanfyri varukeypið við »Herbert May«. Hann hevur haft hond í har.

Formaðurin: A. Samuelsen spurgte, hvorledes det forholdt sig med Renterne til Statskassen. Disse er placerede. Med Hensyn til Varerne med »Herbert May« da ved R. Nielsen som Medlem af Kolmandsforeningen bedre Besked, og han vil sikkert ogsaa give alle ønskede Oplysninger.

A. Samuelsen: Við teimum er gingið so, at fólk bleiv tvingað til at keypa tað ringa teið, men skuldi so fáa gott te aftrat. Men har norði hjá okkum er tað ikki bert soleiðis, at keypmenninir eru tvingaðir at selja ringt te, men teir kunnu ikki fáa av tí góða teinum, tó teir hava bidið um tað. Soleiðis er vorðið har. Har norðuri keypa fólk bæði slaginí av te og kasta annað á sjógvin. Tann maður, ið hevir hetta ringara teið, honum ráðast fólk at keypa annað frá við. Um tað »góðaa mjølið, sum R. Nielasen tók til, skal eg siga, at vit hava nakrar sekkir liggjandi har norðuri hjá okkum, og tað mjølið verður onguntíð selt. Fyrst skuldi tað seljast frívilligt, uttan kort, men tað gekk ikki, so varð tað selt móti korti, og tað vóru nøkur fá, sum royndu tað, men tey komu ikki aftur, antin tey nú eru blivin sjúk ella hvat ið er blivið av teinum; um tey vóru deyð, mátti tað jú verið frætt. Tað var gott at fáa at vita, at hesir sekkir kunnu sendast aftur; so kunnu teir jú verða sendir til Havnar og kanska haðani til Miðvágs, har tey tykjast at vera so fegin við hetta mjølið. Hvat tí dýra mjøli viðvíkir, skal eg ikki koma inn uppá tað, tí tað er klárt, at tað er galið ordnað. Táið fólk kann fáa mjøl frá einum handli fyri 80 oyr kilo og frá einum øðrum fyri 100 oyr kilo, so er ikki at ivast í, hvar tey keypa. Nú er mjøl ein hovuðsvøra í einum handli; har man keypir mjøl, keypir man eisini annað. Eg eri stemdur fyri at avvikla samtshandilin so skjótt sum møguligt uppá ein formuftigan máta.

O. Effersøe: Jeg er helt enig med Poul Nielasen i, at man bør købe Varer, hvor man faar dem billigst, og jeg kan tilføje, hvor man faar dem bedst. Man køber der, hvor man har den bedste Forbindelse. Naar vi er kommet saa godt over Krigen, skyldes det hovedsagelig den gode Forbindelse med København. Amtmanden omtalte Amtmand Rytters Forhold til Herbert Mays Varer. Amtmand Rytter havde ikke bestilt Varerne. Man kunde lige saa gerne lægge Ansvaret paa den Mand, som har baaret Telegrammet til Stationen.

R. Nielsen: Amtmaðurin segði, at eg sum nevndarmaður vistí besked um Herbert May; eg veit bert, at tað var

formaðurin og næstformaðurin í keypmannafelagnum, ið hevði við tað at gera, og so konsul Lützen og amtmaðurin Rytter; men Effersøe tekur vist feil, tí amtskommunan átti nakað av vøru uppímillum, nakað mjøl, trúgvi eg, so teir hava vitað beskeð. Mikkjal Sámalsson talar um tað bygmjølið, at tað eru 3 sekkir í Haldórsvík; um keypmennirnir hovdu vent sær til vørunevndina, hovdu teir fingið teir nm býttar, vel at merkja, um teir skuldu verið spiltir. Um teir í Vík bert hava haft tað ringa teið, skyldast tað keypmonnunum, tí tað hevir verið ein regul í Tinganesi at blanda tað góða og tað ringa helft um helft. Tað hava verið menn norðuri í Vík, ið ikki hava dugað at kóka te.

Poul Niclasen: Eg eri fyri so vítt einigur við Effersøe, men eg haldi, at tað verður tikið ónatúrliga lítið hensyn til okkum Føroyingar frá tí dampskipafelagi, ið flytur vøru og passagerar til Føroya. Íslendingar hava nógv betri kor enn vit. Tað er interessant, at Rasmus Nielsen roynir at fáa sær franskan accent við at stappa nakað í nasagluggarnar. Annars var tað sluttligt at hoyra hansara tos um te, men eg haldi, at hann átti at lært Víkarmenn at kóka te á rættan hátt.

J. Guttesen: Tað er ikki vert at koma fram við nógvum aftrat. Tað var íáðni tos um hetta bygmjølið, ið kom so í orð fyri at vera spilt. Har er ein keypmaður norðuri í Vestmanna, góður sambandsmaður, ógvuliga hampiligur maður, hann hevði eisini fingið nakrar sekkir av hesum mjølinum. Hann er nú ikki vandur við óvandaliga føði, men táið eg spurdi hann, hvussu mjølið var, svaraði hann mær: »Vit bróka einki annað. Eg vil tríva í nakað, sum A. Samuelsen segði, tá hann helt sína næstfyrsta ræðu. Hann segði: Vit sambandsmenn siga so gott sum einki; nú kunnu menn, sum hava sitið her í dag, ikki siga, at A. Samuelsen einki hevur sagt; hann hevir sagt nógv; men hansara orð inega ivaleyst fatast soleiðis, at tað sum sambandsmenn her hava sagt, hevir einki at týða.

O. Effersøe: Det er vel ikke alt Mel, der har været saa godt som det, Guttesen omtaler. Jeg har selv set noget af dette Bygmel, og det var baade sort og grimt, og jeg har set paa det gennem Forstørrelsesglas, og det var nogle grnelige Bæstor, der løb omkring. Det er vistnok rigtigt, som R. Niclasen sagde, at en Del af Varerne med Herbert May tilhørte Amtskommunen, men de ødelagte Varer var Varer, som kom til Købmændene, og som Vareforsyningen overtog. Det var tydeligt, at R. Nielsen ikke forstod sig paa To; Te skal man ikke koge.

H. Samuelsen: R. Nielsen segði, at tað vóru 3 sekkir av mjøli í Vík, eg nevndi einki tal. Íg havi altíð rekvirerað nakað mjøl, og havi tikið móti tí, eg havi fingið. R. Nielsen tosar um at kóka te; vit kóka ikke te, vit trekkja te. Teir kunnu ikki blanda te har norðuri, tí har hava vit bert eitt slag og fáa einki annað. Táið eg fór heiman, hovdu teir ikki kunnað fingið annað te; vit hava noyðst at bróka tað, tí tá ein maður liggur inni við sovorðnum, bróka hann tað heldur enn hann tveitir tað burtur heilt fyri einki.

R. Niclasen: Tað forbavsar meg stórliga at hoyra, hvat mín æraði síðumaður (Effersøe) sigir um bygmjølið. Hann hevir lugt at tí gjøgnum sterkt forstørrilsisglas, men tað er ein kend sak, at táið verður lugt gjøgnum sterkt forstørrilsesglas á mjøl, tá er einki mjøl, ið ikki er heilt livandi. Hatta sigir vitinskapurin, og tað undrar meg, at Effersøe ikki veit tað. Táið Effersøe sigir, at eingin kókar te, so er tað tí, at Føroyingar ikki hava so nógv skil uppá at gera te sum tíl dømis Englendingar, teir gera tað besta te, ið verður gjørt, og teir kóka tað. Tað er fastsettur regul í Tinganesi, at tað skal útlevorast helft um helft av tei, tí ringa og tí góða, og um hasir keypmenn norðuri í Vík hovdu klagað, so hovdu teir eisini fingið hetta rættað.

N. Debess: Tað er ikki at ivast í, at um ein partur av bygmjølinum var óbrúkandi, so var ein stórur partur fult út brúkandi. Eg havi netuppá tosað við ein keypmann á sjálvum tí plassi, hvar Effersøe býr, og hann helt væl um mjølið. Eftirsum Effersøe fleiri ferðir hevur snakkað um »Herbert Maye, vil eg spyrja hann, um hann meinar, at tað var skrivt at vørunevndin befatti seg við »Herbert Maye.

O. Effersøe: Jeg vilde ikke, hvis jeg var Medlem af Vareudvalget, have samtykket i en Ordning paa den Maade, som det skete. — Hr. Rasmus Nielsen maa ikke tro, at jeg for at undersøge Melet brugte noget Forstørrelsesglas af den Slags, der for-

storrer mange Hundrede Gange. Det behovedes saamænd ikke, thi det var ganske gemene Midder, jeg saa i Melet.

N. Debess: Hasi úttalilsini frá Effersoe gera, at eg til fullnar forstandi hansara stilling.

Samtykt varð at beina sakina í figgjarnevndina.

Fundur miðvikudag 27. august.

Pensiónsrættur fyri realskúlakennarar.

2. viðgerð.

Orðforarin (prósturin) greiddi frá nevndar álitinum og mælti til, at tingið samtykti, at sakin fór til 3. viðgerð.

J. Patursson: Mær er einki ímóti, at vit geva hesum lærarunum eftirlon; men tá eg ikki kann stemma fyri tí, so er tað tí, at eg heldur ikki kundi stemma fyri at byggja nýggj hús til sama skúla. Eg haldi, at í hesum skúla verður landsins mál víst eina vanvirðing, sum ikki kann vera verri enn hon er. Tað er jú ikki einans tað, at man ikki lærir landsins mál í hesum sokallaða realskúla, men tað gongur so hart til, at lærararnir ikki hava loyvi at siga eitt orð á føroyskum. Tað er beteinkiligt, at okkara hægsta skúlaverk er soleiðis skipað, og at løgtingið, sum skuldi verja landsins rætt lívgar hættar verk, sum er til fyri at forkoma tað týdningarmiklasta vit eiga, okkara mál. Um og annars einki havi ímóti eftirlon til lærarar, so kann eg tó ikki her vera uppi í. Eg veit ikki enn, um eg til triðju viðgerð vil koma við einum nýggjum uppskoti.

Prósturin: Eg kann geva Patursson viðhald í, at okkara mál ikki hevur tann rætt í realskúlanum, sum vit ynskja. Men og haldi ikki at lærararnir skulu koma at sviða fyri tí; tí teir kunnu ikk gera við, at tað er so.

O. Effersøe: Jeg vil ikke udtale mig om det er, som det burde være, med færøsk indenfor Realskolen. Jeg vil dog minde om, at det Parti, som Patursson tilhører, er i Flertal. Jeg synes ellers ikke, at dette Spørgsmaal paa nogen Maade maa have Indflydelse paa den Sag, som er for her i Dag.

J. Patursson: Eg vil svara til Effersoe, at tað hvorki skuldi vera undin eitt fleirtals ella minnihluts sak at rokta tungumál okkara. Vit ábbu tó at vera kommin longur enn so. Man skuldi tykjast, at bæði sambands- og sjálvstýrismenn máttu vera samsintir í hesum. Tað var her á tingi fyri 14 árum síðani úttalað, at teir menn, sum landsins breyð eta og njóta teir skuldu læra landsins mál. Hektar var sagt av einum góðum sambandsmanni.

O. Effersøe: Jeg vil ikke fordybe mig i det af Patursson rejste Spørgsmaal, for det har ingen Sammenhæng her. Men det er en Selvfølge, at Sambandspartiet har Interesse i at Færøsk indtager den Stilling, som er forsvarlig og rigtig. Naar jeg sagde, at Selvstyret var i Flertal, saa var det fordi at Flertalspartiets Formand beklagede sig over, at Sproget har en daarlig Stilling i Realskolen.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Skúlahús í Lamba.

2. viðgerðar.

Orðforarin (prósturin) greiddi frá nevndarálitinum. Utan fyri skúlan skal gerast ein garður til børnini at ganga í og at spæla í. Viðurskiftini eru oftast soleiðis, at skúlastovurnar úti á bygdunum standa mitt úti í bonum, og tað er eitt ill tún utanfyri. Táið børnini eru úti, standa tey autin og krýpa saman undir húsunum alla renna úti á bonum. Meiningin við at geva børnunum frí millum tímarnar skuldu jú verið, at tey fingu nort sog, men tað er ikki í øllum bygdum at nonnum dámar, at børnini renna úti á bø teirra, og hetta verður ofta meinskað inn á skúlan og lærarar. Vit hava tí meint, at tað eigir at gerast ein slíkur garður utan um skúlan í Lamba, eins og tað eigir at vera gjørt við allar skúlar, id hereftir verða bygdir í Føroyum. Í hesum garði skal so vera ein retirada, soleiðis sum tað nú krevst í einum skúlagarði, og umframt eitt goymsluskúr til torv og annað id hoyrir skúlanum til. Sum nú er, verður torvið ofta tvætt utanfyri skúlan, ella liggur á gólvinum í

skúlastovuni, ja, summastaðni er tað soleiðis, at børnini koma í skúla hvørt við sínari torvu. Ein onnur umstøða er, sum eg vísti á ein annan dag, at tað oftast er trupult fyri lærarum og lærarinnum at fáa innivist í bygdunum, og tað vildi tí verið gott, um vit kundu lingið teimum eitt ávíst stað, har tey kunnu búgva og hava teirra bøkur og nørar lutir, tó at tey kunnu vera í kost aðra staðni. Vit hava tí skotið uppá, at tað á skúlaloftinum, sum annars oftast stendur ónýtt verða gjørdar ein ella tvær stovur til lærarans. Kostnaðurin við skúlan verður eftir hesum o. u. 8,000 kr. Vit halda tað í nevndini vera neyðsynt, at Lamba fær skúla, og vit skulu tí mæla tinginum til at biðja statin geva helft av peninginum. Væl er hetta nógv størri peningur enn vant er til skúlabyggingar, men vit vilja kortini mæla tinginum til at biðja statin geva helft sum vant, og skal eg tí biðja tingið samtykkja at sakin fer til 3. viðgerðar.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Skúlastova á Hellunum.

2. viðgerð.

Prósturin: Henda sak er hinari frammanundan ógvuliga lík. Tað er komið bønarbræv frá forstandarskapinum fyri Fuglafjarðar sókn um studning til byggingar av skúlastovu á Hellunum. Henda sak hevir verið til ummælis 2 reisur áður á tingi, seinast varð hon útsett fyri fyrst, tá var hon saman við einari sak um skúlastovu í Funningsbotni. Nú eru søknirnar atskildar, og nú er her bert talan um skúlastovu á Hellunum. Har eru nú 18 skúlalær børn og tað er vónandi at talið í teim nærmastu árum verður væl støri. Eingin teikning er av hesum skúla og einki yvirslag, men hesin skúli skal vera eins og skúlin í Lamba, so kostnaðurin verður tann sami. Vit halda í nevndini, at hesin skal byggjast á sama hátt sum hin, við garði utan um, goymsluskúri, og stovum á loftinum til lærarans. Vit skulu tí mæla tinginum til at biðja statin geva helft av kostnaðinum, sum hann er vaxin. Eg skal biðja tingið taka væl undir hesa sak og lata hana koma til 3. viðgerðar.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Bønarbræv frá frú A. S. Mohr um eftirlon.

2. viðgerð.

Prósturin: Einkjan Anna Sofie Mohr, kona lærarans Jens Martin Mohrs, ið var lærari her í Havn og doyði í vár, hevir skrivað til tingsins og biðið um, at hon má fáa eina einkjupensión. Hon er 41 árs gomul, hevir sjálv lærariomuprógv og hevir áður sjálv verið lærarinna her í Føroyum. Hon hevir 3 børn, sum hon er einsamøll um at forsyrgja. Maður hennara, Jens Martin Mohr, sum hevir verið lærari ymsa staðni í Føroyum, kom fyri fáum árum síðani sum lærari higar til Havnar. Hann var ein sera dugandi og góður lærari, ið hevði kostað nógv uppá sín lærdóm og var ógviliga nærlagdur í sínum yrki. Hann varð sjúkur av teirri sponsku sjúkuni í vetur og varð hon honum at deyða. Einkjan upplýsir, at hon hevir eina yvirlivilsirentu av 317 kr. um árið, men annars má hon sigast ikki at sita væl eftir. Løgtingið hevir áður haft slíkar sakir til ummælis, og einkjurnar hava tá fingið eina lítla pensión. Nevndin vil skjóta uppá, at einkjan A. S. Mohr av pensiónskassanum fær 100 kr. um árið og at tingið biður ministeriið um loyvi til at lata henda pening. Hon er lærarinna og vil kanska seinni sókja eubæti aftur í fólkaskúlanum, og so vil pensiónin falla burtur. Eg skal mæla tinginum til at taka væl undir hesa sak og lata hana fara til 3. viðgerðar.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Bønarbræv frá H. P. Djurhuus um viðurlag fyri skaða í grindadrápi.

2. viðgerð.

A. Samuelsen: Mangur fær tað, ið øðrum er ætlað, men eingin fær, hvat øðrum er lagað, plagar man at taka til, og so var við mann í dag. Tað var ikki ætlað, at eg skuldi vera orðførari í hesari sak, men við tað at allir sjálvstýrismennirnir í útvalginum eru burtur, hevir umstøðurin givið mær ordra at siga nakrar orð herum. Vit vita, at hesin maður fekk skaða í grindadrápi ífjor, og vit eru vanir at geva

erstatning fyri sovorðnan skaða. Hann fekk skaða í fótin, sum menn meina, at hann vil bohalda fyri sína tíð, tað er tí ríniligt, at hann biður tingið um erstatning. Tað er nakað vanskiligt fyri útvalgið at avgera, hvussu nógv vit eiga at geva manninum í erstatning, vit hava roknað út, hvat hann hevir haft av útreislum og so lagt eitt sindur aftrat. Hann hevir til doktara og aðra sjúkuútreislu betalt 361 kr. 60 oyr, tað er upplýst av sjúkukassanum har suðuri. Útvalgið inn stillar, at man skal geva honum 500 kr., og eftir nánari meining er erstatningin sett so lágt, sum hon kann setast, 150 kr. fyri tann skaða, hann hevir fingið, er ikki nógv. Eg hopi, at líkasum útvalgið er einugt í hesum, at so eisini tingið kann einast um henda erstatning. Eg skal anbefalla, at útvalgsins innstilling verður fylgd, og skal biðja tingið um at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Styrkur til koyp av einari kúgv.

2. viðgerð.

Ordføraria (A. Samuelsen) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerð.

Poul Nielsen: Tað var bert nakrir fáir bemerkningar viðvarandi hinari sakini. Tað var sagt, at mangur fer tað øðrum er ætlað, men eingin tað, ið øðrum er lagað, hetta orðatakið kann óivað hóska í mongum tilfeldum, men tað gildur í hvussu er ikki yvirfyri *lógini*.

H. Samuelsen: Tá henda sakin var til 1. behandling helt eg meg kenna á mer, at her ikki var nakar góður stoðningur fyri henni, men eg hevði tó ikki trú kortini, at tað skuldi fara og verða sovorðin einigheit um at gera enda á henni. Tað verður nú sagt í líkfalsini, at hon má doyggja, tí vit hava ikki miðlar at geva henni: tað er bedrøviligt fyri okkara aðru pasientar í útvalgsinum, sum eisini krevja neving: og frykti fyri, teir fara sama vegin. Eftir øllum líkindum at doma er sakin ivaloyst deyð og fyri mína skyld kann tingið tí líkagott ídag gera doyðsfallið kunnugt.

J. Guttesen: Eg sagði við 1. viðgerð, at eg mintist eitt tilfeldi her frá tinginum, sum var ógviliga líkt hesum: tað var ein maður, sum hevði mist nógvan seyð og sum tí fekk stuðning frá tinginum. Eg haldi ikki tað í roynd um er so stórur munur millum hesi bæði tilfeldini tað er líka stórur missur fyri ein fátækan mann at missa eina kúgv, sum tað var fyri hin at missa seyðin.

A. Samuelsen: Eg eri alls ikki ókendur við tey følilsir, ið liggja aftanfyri orð teirra tingmonnum í Norðstreymoy. Guttesen sigur frá einum tilfeldi, hvar tingið hevur bevilgað pengar til ein mann, sum hevði mist ein hóp av seyði, og samanlíknar tað við hetta. Tað kann tað nú ikki beinavegin, tí har galt stuðningurin eitt tilfeldi, hvar smitsom sjúka var komin í seyðin og hevði forvoldað nógvan skaða. Tað er nakað, sum vónandi ikki ofta vil fyrikoma, men at ein maður missir eina kúgv, tað kann tíverra ofta henda. Skuldi tingið plikta seg til at hjálpt í øllum slíkum tilfeldum, so máttu vit helst haft ein serligan kassa afturat, hvarav vit góvu tilskot til menn, sum hevdu mist neyt. Nú kann onkur siga: Jú, men vit kunnu lata henda mannin fáa hjálp fár og síðani krevja at noytaeigarar forsikra neyt teirra í tí tilstundandi kríatúrforsikringini. Teir sum meina so, kunnu nú stemma fyri, at sakin fer til eina 3. viðgerð og har seta fram eitt motiverað endringsforslag um at bevilga hesar pengar. Ein grund, sum hevur verið bestemmandi fyri meg er, at eg veit, at tingið fyrr hevur avvist akkurat líknandi andragandir, og eg frykti fyri, at den slags tilfeldir fara at verða sonógv, at tað vil føra nógv ovvítt.

N. Debess: Tað tykist mær greitt, at hetta er eitt extraordinært tilfeldi: tað dreyar seg her ikki bara um ein mann, sum mist hevur eina kúgv, men hesin maður hevur fleiri ferðir verið útsettur fyri tí sama óhappi. Og tí haldi eg tað er ein hóskiligur sak hjá tinginum beinleiðis at siga, hann skal einki fáa. Sammanberi eg hetta við hitt tilfeldi frá ífjor, tá tingið lat stýrk til ein mann, sum mist hevði nakrar seyð, so haldi eg tað vera minst líka stóra grund til eisini at veita stuðning her. Tað undraði meg tí at annar tingmaðurin fyri Norðstreym, Mikkjal Símonsson bara hevði nakrar leysar bemerkningar at gera og annans gav tað heila upp. Eg hevði betur fatað, um hann hevði boðað frá at hann vildi seta fram broytingaruppskot. Tað

kundi tó verið, at tingmenn fólu undir við einum uppskoti um, at maðurin skuldi fáa stuðning uppá eitt annað máta. Um Mikkjal Símonsson og Guttesen seta fram líkt uppskot, vil og vera við teimum.

O. Effersøe: Det er en farlig Ting, at et Udvalg lader sin Stilling bestemme under Henvisning til, hvad der er Lagtingets Praksis; det er nemlig ret vanskeligt i alle Tilfælde at sige, hvad der er Tingets Praksis. Jeg har altid bestræbt mig for at skabe en saadan Praksis og ikke lade mig paavirke i min Stilling af øjeblikkelige Stemninger. I Spørgsmaal, hvor det drejer sig om Bevillinger, ser man ofte, at Udvalget er standhaftigt nok, men forekommer der saa et Ændringsforslag, skal dette være meget slemt, hvis det ikke samler Stemningen for sig. Og navnlig naar der appelleres til Udvalgets gode Hjerte, saa giver dette gerne - - om jeg saa maa sige - Polker i Principperne og gaar over til Ændringsstillerne. Jeg vil holde fast paa, at Tingets Sedvane er det sædvanlige, mens de enkelte Tilfælde er Undtagelser. Jeg tror ikke, at jeg har været medskyldig i disse Undtagelser. Jeg ser mig ikke i Stand til at afvige fra den Stilling, jeg har indtaget i Udvalget. Hvis jeg forstod Hr. Mikkel Samuelsen ret, saa ser han saa mistrøstig paa Sagens Skæbne, at han ikke vil stille Ændringsforslag.

M. Samuelsen: Ja, eg hetraktaði sakina mestsum hopleysa, men aftaná tað, sum nú er framfarið, lýkist tað sum hon kanniska ikki er so deyð, at tað kann fáast lív aftur í hana. Til Nýhólm Debess vil eg siga, at eg undir 1. viðgerð gav allar tær upplýsingar, sum kravdust, og eg helt ikki, at tað var nakur grund til at taka tað uppaftur. Er nakað hop fyri sakini, so skal eg vera tann fyrsti at taka undir við.

J. Samuelsen: Eg forstandi so væl, at teir, sum vónleysir vóru nú nøkta ryggin aftur; eitt serligt frøvst millum hvørt einstakt boðað frá, at hann vil stilla undringsforslag. Útvalgið hevur verið noytt at fylgja teim prinsippum, sum galda fyri teir kassaar, tað hevur við at gera. Um onkur annar útvegur hlívur ávístur í einum endringsforslag kundi eg gott tonkt mær at stemma fyri tí. Men okkara prinsippir geva onga heimild til stuðning í hesum tilfeldi. Gott hevði tað verið, um vit kundu blivið samsintir um eina bestemta máta at hjálpa uppá.

M. Samuelsen: Tá aðrir halda, at tað kann nytta at seta fram endringsforslag, so vil eg ikki lata hesa chance óroynda, so vil eg eisini gera alt hvat gerast kann.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Lonhækkan til fiskavrakara.

2. viðgerð.

Ordføraríin (*J. H. Poulsen*) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerð.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur tórsdag 28. august.

Stuðningur til skúlaskeiðs.

2. viðgerð.

Formaðurin upplas uppskot figgjarnevndarinnar, sum gekk út uppá at geva tann vanliga stuðning.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Viðurlag fyri hjarging av einari mannskipan.

2. viðgerð.

Formaðurin upplas uppskot figgjarnevndarinnar, sum gekk út uppá, at tingið ikki kundi geva nakað viðurlag. Sakin kom til endiliga viðgerðar.

Samtykt varð at játta uppskotinum.

Studningur til Føroya fólkaháskúla.

2. viðgerð.

Formaðurin upplas uppskot figgjarnevndarinnar um at geva av økonomisk fond 600 kr. fyri árið 1920—21.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Rannsókn av seyðasjúku.

2. viðgerð.

Formaðurin upplas uppskot figgjarnevndarinnar, ið gekk út uppá av økonomisk fond at gjalda kongsbónda Andreas Weihe, Selatrø, 25 kr. fyri útreislur, hann hevði haft av hesari grannsking.

Samtykt varð at lata sakina fara til 3. viðgerðar.

Fundur leygardag 30. august.

Pensiónsrættur fyri realskúlakennarar.

3. viðgerð.

Orðfararin (próstin) mælti tinginum til at samtykkja nevndaruppskotinum.

Tað varð samtykt.

Skúlahús í Lamba.

3. viðgerð.

Orðfararin (próstin) mælti til at samtykkja nevndaruppskotinum.

Tað varð samtykt.

Skúlastóva á Hollunum.

3. viðgerð.

Orðfararin (próstin) mælti til at samtykkja nevndaruppskotinum.

Tað varð samtykt.

Bonarbræv frá A. S. Mohr um eftirlon.

3. viðgerð.

Orðfararin (próstin) mælti til at samtykkja nevndaruppskotinum.

Tað varð samtykt.

Bonarbræv frá H. P. Djurhuus um viðurlag fyri grindaskaða.

3. viðgerð.

Orðfararin (M. A. Winther) mælti til at samtykkja nevndaruppskotinum.

Tað varð samtykt.

Styrkur til keyp av einari kúgv.

3. viðgerð.

Orðfararin (Winther) mælti til at samtykkja nevndaruppskotinum.

M. Samuelsen: Eg havi saman við hinum tingmanninum úr Norðstreym sett fram eitt endringsforslag í hesi sak. Tá útvalgið hevur framfort sum grund fyri at nokta andragandið, at tað ikki vil skapa eitt precedens í tinginum fyri sovorðnum bevillingum, so kann eg ikki vera einigur við tí í hesum. Eg haldi ikki her var skapt nakað precedens, um hesin maður fekk ta hjálp, han biður um, tí hetta er eitt einastandandi tilfelli; hann hevur í 14 ár mist

í kýr. Nú er jú talan um eina kríatúrforsikring, og eg gangi útfra, at allir kríatúreigarar lata sínar dýr forsikra; so hurtfalla sovorðnir styrkir av sær sjálvum. Okkara endringsforslag gongur út uppá, at vit anbefala at tingið av ekonomisk fond letur hendá mann fán 50 kr. í hjálp til anskaffilsi av einari kúgv. Eg vil fyrisláa tinginum at samtykkja hetta forslag.

(Broytingaruppskotið varð ikki samtykt — Nevndaruppskotið varð síðani samtykt).

Lonhækkan til fiskavrakara.

3. viðgerð.

Formaðurin las uppskotið frá figgjarnevndini, sum gekk út uppá, at hækka lønina hjá fiskavrakarum í Føroyum.

J. H. Poulsen (Orðforarin): Eg vil loyva mær at anbefalla uppskotið.

Sakin varð samtykt.

. . .

Landbúnaðarskúli.

. . . .

J. H. Poulsen: Vit standa her yvirfyri loysningini av eini sak, sum leingi hevur verið fyri hor á tingi. Vit vilja vóna, at sakin nú hesa ferð má fáa eina góðan loysning. Eg skal loyva mær at byrja við nokrum historiskum bemerkningum. Tað var í 1875, at bonarbræv var frammi á logtinginum um at fáa eitt djóralækna. Tingið meinti tá, at hetta skuldi vera eitt maður sum var væl inni í landbúnki, og at hesin maðurin skuldi fáa eitt garð at rokja, hvar honum kundi gevast loyvi at sýna sín lærdóm í praksis. Tað var hendan sakin, sum førdi til, at tingið í 1878 gav 400 kr. árliga í 3 ár til studning fyri eitt mann til at taka veterinæreksamen. Í 1882, tá maðurin var útlærdur, reisti amtmaðurin tann spurning í tinginum, hvat mann nú skuldi gera. Men tá sýntist tingið ikki vera skeint fyri at gera meiri.: tað úttaladi, at tað ikki var nakar garður at fáa til mannin og at tingsins peningaviðurskiftir vóru so smá, at teir ikki kundu geva honum meiri løn enn 200 kr. um árið. Summir hildu, at tingið als ikki kundi geva honum nakra løn, og hetta varð so samtykt. Tað stutta uppriðið frá 1882, sum finst um hesa sak, er rætt forvitnisligt at lesa. Í 1884 reistist sakin aftur á tingi og hesa ferð fra J. Dalsgaard í Skálavík av nokrum greinum, sum stoðið hovdu í »Dimle. Hann hevði verið úti og lært, var komin aftur, og hann, sum aðrir tílíkir, var túsur eftir at fáa føroyskt landbrúk í eitt betri lag. Tá viðtók tingið sín innstilling til regeringina um pening eina ferð fyri alla til eitt nýnsturbrúk og árligan pening til at dríva tað fyri. Regeringin fyrisló so at byrja eitt nýnsturbrúk í Áløkeri, men sakin fall í landstinginum: teir hildu har at tað ikki var nokur grund til at uppretta nýnsturbrúk í Føroyum. Hesin maðurin fekk so heldur ikki loyvi at brúka síni evnir. Í 1886 var aftur bonarbræv til royndarbrúk frá Poul Petersen í Kirkjubø, men tingið gav tí ongan fram. Í 1892 reistist sakin av nýggjum av J. Patursson, og Sehrotar tóku væl undir. Tá samtýkti tingið at sokja um 9000 kr. til royndir í Kirkjubø fyri 6 ár: næmingar skuldu kunna koma hagar, og teir skuldu kunna fáa styrk til at læra. Hettar er tann einasta royndin, sum er gjord í Føroyum viðvíkjandi at geva kunnleika í landbrúki. Í 1898 lá spurningurin fyri, um mann skuldi halda fram soleiðis, sum byrjað var. Men tá sýntist nakað at vera komið í vegin. Kanska var tað politikkur. Sehrøter sýntist tá at vera komin í mótstøðupartin. Í alfall bleiv tað spurt, um tað, sum gjort var, nyttaði nakað. Eg fyri mín part haldi, at tann virksomheitin í Kirkjubø hevur gjort stóra nytta. Tað er nógv umbroytt viðvíkjandi føroyskum jarðarbrúki frá fyrst í 90-unum og skyldast royndarbrúkinum í Kirkjubø. Men tingið samtykti, at tað ikki skuldi haldast framm við hesum, men viðlók istaðinfyri at sokja um 700 kr. frá statskassanum til ein mann, sum kundi ferðast um at læra fólk at brúka plógv, harvi og vogn o. s. fr. o. og so skuldi eisini premiur gevast til dugnaligar jarðarbrúkarar. Og so var eisini samtykt at biðja um, at ein maður, sum var kunnugur í jarðarbrúki, skuldi koma higar og granska viðurskiftini og síðani gera uppskot um at hjálpa føroyskum jarðarbrúki áleiðis. Men alt hetta kom síðani ongan veg. Í 1900 var so frammi á tingi bonarbræv frá J. Patursson og M. W. Lützen um landbúnaðar- og húshaldsskúla. Men hendan sak varð útsett til 1902 við tað, at uppskot var komið framm um at knýta landbúnaðarskúla saman við fólkaháskúlanum. Sakin datt

tó burtur tað árið í tinginum og náddi ikki at koma til 3. viðgerð.

Landbrúksskúlasakin bleiv so eftur bohandlað í landbúnaðarkommissiónini, og atvoldin var eitt bonarbrøv frá Sandoyingum og Vágamonnum. Sakin var borin framm á ting av A. C. Evensen og Z. Nielsen.

Uppskotið frá landbúnaðarkommissiónini gekk út uppá, at fáa ein privatan landbúnaðar- og húshaldsskúla, ikki tí at man ikki vildi hava ein offentligan skúla, men tí, at teir hildu, at hetta var lættari at fáa í lag. Tað er ikki stórur munur millum uppskotið frá landbúnaðarkommissiónini, og tað uppskot, sum nú er frammi. Hetta uppskotið tykist stórri, tí her er skúlin býttur í tvær deildir: ein styrri og ein meiri umfatandi. Hetta arbeiði lá so stilt og sakin við. So kom bonarbrøv til tingið um at fáa arbeiðið uppaftur tikið, eg minnist ikki, um tað var frá bóndafelagnum sum felag ella frá einstøkum limum av tí, og í 1917 varð so útvegað tekningar og yvirslag til ein búnaðarskúla, og tingið samtykti, at biðja ministeriið um hjálp til at fáa ein slíkan skúla stovnaðan á Kjalnesi. Tað var væl hildið tá, at tann garðurin umframt, at hann lá toliliga centralt, eisini vildi vera lættur at fáa til hetta brúk, við tað, at bóndin, ið hevir garðin, er gamalur og hevir eingi born, og prósturin, til hvørs embæti garðurin hoyrir, er siunaður til at láta garðin. Tað kgl. landhúsholdningsselskapið niðursetti so eftir uppfordring frá ministeriinum eina kommissión til at granska henda spurning. Harí vóru fyristøðumennirnir, statsráðgevararnir K. Hansen í Lyngby og F. Hansen í Askov, og umframt var tilkallaður heraðsfúti Helms, ið hevir verið sorinskrivari í Føroyum og kontorchef Flensborg ið eisini er kendur her. Teir hava skrivað nevndarálit til hitt »kgl. landhusholdningsselskab», ið so hevir fyrilagt ministeriinum tað. Ministeriið sendi so eina nevnd til Føroya, har vóru uttur hrr. K. Hansen og F. Hansen, fiskarídirektør Mortensen og sum skrivari hr. Lutzen. Logtingið valdi eina millumtinganevnd til at samráðast við hini donsku nevndini. Seinni kom boð frá ministeriinum um nevndin ikki vildi koma niður til Keypmannahavnar og samráðast við teir har, og fór millumtinganevndin eisini niður. Urslitið var fleiri uppskot: eitt um stovnan av einum ella tveimum royndarstoðum, eitt um stovnan av búnaðarskúla, um roynd við forbetraðum seyðabrúki, eitt um stovnan av fiskariskúla og húshaldskúla. Har var í finanslógini givin ein bevilingur uppá 52,000 kr. til upplýsandi forarbeiði, húshaldsskúla og royndir fyri at bota um seyðabrúk. Hetta er, hvat ið fyriliggur í ár. Saman við millumtinganevndini vóru ríkisdagsmenn Føroya og samráðslust við hina donsku nevndina. Man var eitt sindur ósamdur um, hvar skúlin skuldi liggja, á Kjalnesi ella í Hoyvík. Eisini var eitt sindur óeinigheit um, hvussu bestýrilsi skuldi samansetast. Vit hava nú í nevndini haft alt hetta til umrøðu, og við tað, at henda stóra betonkning fyriliggur, skulu vit ikki ganga ov nógv inn uppá tu tekniskn síðu av sakini, eg meini, hvussu skúlin skal vera innrettaður, men vit hava tikið teir spurningar fram, um hvar skúlin skal liggja og hvussu hann skal administrerast. Tað er ætlanin, at tað umframt sjálvt royndarbrúkið í skúlanum, skal vera ein lítil royndarstoða á einum eigindómi, sum landbrúkskonsulentarin eigir í Tvøraradali, og sum hann er villugur at láta fyri bíligan pris, og eitt lítið royndarbrúk í Kirkjubø, sum hrr. Olaset Patursson skal standa fyri. So eru spurningarnir um vandrilærararnar, og um vit skulu gera royndir fyri at bota um seyðabrúkið. Eg skal taka til hesar spurningar í hesari rekkjufylgi. Fyrst: hvar skal skúlin liggja? Vit eru ikki samsintir í nevndini, 4 eru í einum partinum, 3 í hinum. Vit, sum vóru í Keypmannahavn í vetur, Joen Poulsen, R. Rasmussen og eg, hava somu stoðu, sum vit hevdu tá, og sum hin danska nevndin eisini tók, at skúlin eigir at liggja í Hoyvík. Hetta er okkara persónliga stoða, sum vit tóku tá uttan at vilja binda logtingið, men vit hildu, og halda enn, at tað sum var framfort av stadsráðgevarunum F. Hansen og K. Hansen fyri at skúlin átti at liggja so nær Havnini sum møguligt, hevði stóra vekt, og vit mega halda hesar menn fyri kapacitetir á hesum økinum. Umframt kunnu vit sjálvir siggja, at skúlin vil liggja nógv betri í Hoyvík enn á Kjalnesi. Tað mesta, ið skal vera gjort á skúlanum, skal jú vera royndir, og tað vil hava stóran týdning fyri fólk at kunna koma til skúlan og siggja hesar royndir. Men tá liggur Hoyvík nógv hagligari fyri at koma til enn Kjalnes. Tað er sum teir pladdu at siga í gamlari tíð: allir vegir leiða til Róm: so kundu vit í Føroyum sagt: allar leiðir liggja til Havnar; tað er allastaðni í Føroyum lættari at koma til Havnar og verða hýstur í Havn enn til Kollafjarðar og vera hýstur har. Tað er eisini framfort, at so og so nógvir lærarar skulu vera við skúlan; um hann nú kemur at vera nær

við Havnina, vil tað vera lætt at fáa tímalærarar hadani, meðan tað annars má verða settur ein lærari afturat. Hetta hevir tó ikki so nógv at týða sum hitt tað verður burt nakrar túsund kr. tað verður tala um, men og meini, at tað er beint at at fáa samlað so nógv sum møguligt av slíkum fyritokum uppi Havnina, hvar tað er lættast atgongd fyri øll fólk í Føroyum at koma og síggja úrslitið, og vit mega royna at skapa eitt kulturcentrum í Føroyum, og tað verður helst í Havn. So er tað spurningurin um, hvussu stýrið skal vera sammansett. Um tað er uppskot framsett av R. Rasmussen, Joen Poulsen, Effersøe Samuelsen og J. H. Poulsen um, at tað skipast soleiðis: »Administrationen af Skolen og Forsøgsvirksomheden bestaar indtil videre af en af Justitsministeriet udnævnt, paa Færøerne boende, Formand, Landbrugskonsulenten som Sekretær og et af Lagtinget valgt landbrugskyndigt Medlem; desuden et Medlem, valgt af Foreningen af danske Landbrugsskolelærere og et Medlem af Statens Planteavlsudvalg. De tre førstnævnte Medlemmer danner Forretningsudvalg for Virksomhedens«. Av Patursson og R. Nielsson er framsett fylgjandi uppskot: »Administrationen af Skolen og Forsøgsvirksomheden bestaar af en af Justitsministeriet udnævnt, paa Færøerne boende Formand, Landbrugskonsulenten som Sekretær og 3 af Lagtinget valgte landbrugskyndige Medlemmere. Hetta leggi eg nú ikki so nógva vekt uppá, meira umráðandi er tað eftir mínari meining, at vit samtykkja at leggja skúlan í Hoyvík, av tí at vit annars kanska kunnu fáa vanskeligheitir ---Av allari nevndini er framsett soljóðandi uppskott: »Der oprettes en Forsøgsstation for Plantekultur i Traðardali paa Sandø og en mindre Forsøgsstation i Kirkebø. — Av allari nevndini utan Samuelsen er framsett hetta uppskot: »Der paabegyndes en Vandrelærervirksomhed til at forberede Landboskolens Arbejde i Henhold til, hvad det af Justitsministeriet nedsatte Udvalg i Landbrugsskolesagen har foreslaaet. Lagtinget vælger et Centraludvalg paa 3 Medlemmer til at organisere og tilrettelægge Vandrelærervirksomhedens. Av Samuelsen er framsett uppskot um at heimla nevnd skal hava 5 limir í staðin fyri 3. --- Av allari nevndini er framsett soljóðandi uppskot: »Der søges tilvejebragt en passende Hauge, hvor der kan foretages Forsøg med et forbedret Faarebrug. — Det overlades til Amtmanden efter Samraad med Landbrugskonsulenten og to i Faarebrug kyndige Mænd at tage Bestemmelse om Pladsen for det nævnte Forsøgsbrug. Vit hava tonkt okkum, at royndargerð í Føroyum skal ganga inn sum eitt lið í tí dousku, og har er tað landbrúksministeriið, sum útnevnir forsøksleiðaran. Vit hava tí ikki hildið tað vera nakra grund til at fravíkja tað í hesum. Eg vil anbefala okkara uppskot, og at sakin fer til 3. behandling.

O. Effersøe: Jeg finder det i og for sig rigtigt, at Ordføreren har kastet et Blik tilbage paa Sagens Forhistorie, men mener paa den anden Side at en saadan Fremstilling burde være aldeles objektiv og ikke have indbraget noget personligt i Behandlingen. Der er derfor enkelte Ting, jeg vil berøre, da jeg selv har haft en Del at gøre med denne Sag og vistnok kender mere til disse Ting end Ordføreren, ikke mindst til de Personer, som dermed staar i Forbindelse. Ordføreren talte om Forsøgs- og Monsterbruget i Kirkebø og nævnte her afdøde Lagtingsmand Schrøter som den, der havde indlagt sig betydelig Fortjeneste af, at Sagen fortes ud i Virkeligheden. Jeg indrømmer gerne, at Sagen forelaa saaledes som af Ordføreren fremstillet. Schrøter indbragte den med et Forslag, stillet af ham selv, men som det fremgaar af Sagen var der i Begyndelsen en mindre god Stemning for den. Det kunde for en Del skyldes, at Patursson den Gang var en ny Mand, ung og i stærk Opposition til det bestaaende paa dette Omraade. Schrøter selv var ganske vist altid en varm Talsmand for de Sager, han tog sig af, men han kunde til Tider være ret yderliggaaende, saa at de Folk, der ikke var saa stærkt for at gaa fremad i Udviklingen og helst holdt igen, let blev indtagne imod ham. Men samtidig var han en stor Taktiker; det første han gjorde var at slaa fast: Vi skal have et Forslag fra Patursson, og saa skal han ikke blande sig mere i denne Sag! Han var nemlig bange for, at hvis Patursson kom til at forhandle med Lagtingsmændene, saa vilde disse let --- for at bruge et folkeligt Udtryk --- blive gale i Hovedet. Schrøter henvendte sig dernæst til mig, der jo havde en Del Forbindelse med de mere besindige indenfor Lagtinget. Vi gik saa til Kirkebø, talte med Patursson og undersøgte Forholdene, og efterhaanden voksede Stemningen i Tinget sig saa stærk for Sagen, at Oprettelsen af et Forsøgs- og Monsterbrug blev vedtaget med 11 Stemmer. Naar Ordføreren i sin Omtale af, at Forsøgsbruget blev opgivet og ikke fortsattes, lader forstaa, at dette skyldtes politiske Grunde og siger det saadan, at det maa forstaas som et

Angreb paa Sehrotor, saa kan jeg aldeles ikke være enig med ham; der var forskellige Grunde, og en af dem var vistnok den, at Paturssøn ikke havde fulgt den Plan, der var opstillet; det var, saavidt jeg mindes, i nogen Grad Tilfældet. Det er derfor ikke rigtigt af Ordføreren at fremstille Sagen saaledes, at Sehrotor senere af politiske Grunde fik Forsøgsbruget til at falde. Efter Ordførerens Fremstilling skulde man nærmest tro, at al den Fremgang, der her til Lands er sket paa Landbrugets Omraade, hidrører fra den Skole, som den Gang var i Kirkebø. Det kan jeg for saavidt være ret tilfreds med, som jeg i 1891 støttede den efter bedste Evne, men det er dog at se for ensidigt paa Tingene. Jeg vil aldeles ikke benægte, at denne Skole har haft sin Andel i Fremgangen indenfor vort Landbrug, som desværre ikke er særlig stor, men her er der saa mange andre Aarsager, som har grebet ind: den stigende Forbindelse med Omverdenen og Paavirkningen derfra, — det er, om jeg saa maa sige, kommet med Tiden. Der er ogsaa andre Personer, der har ydet deres Indsats her; vi har saaledes i en Række af Aar haft en Landbrugskonsulent, der, selv om han ikke magtede sin Opgave tilfulde, har haft en stor Andel i den Fremgang, her er foregaaet. Samtidig maa jeg fremhæve, at der stadig har hængt ligesom en Vægt paa denne Sag og hindret dens Fremgang; det er den Fremgangsmaade, de Personer har brugt som ønskede Fremgang i Landet. De har optraadt for stærkt kritiserende mod det gamle, for agressive mod dem, der holdt igen, og derved udøsket mere end nødvendigt. Dette vil jeg understrege stærkt, og jeg vil advare mod denne Fremgangsmaade i Fremtiden; den kan kun virke hæmmende. — Hvad den foreliggende Betænkning angaar, vil man se, at jeg i Hovedsagen har kunnet følge det, som Udvalgets Flertal foreslaar. Med Hensyn til Skolen skal jeg dog gøre den særlige Bemærkning, at den synes mig vel saa stort anlagt, baade hvad Lærefag og Elevantal angaar. Dette har maaske ikke saa megen Betydning i Øjeblikket, da det jo ikke er endelig fastslaaet, hvorledes Skolen skal være, og der jo vil hengaa en Del Aar, før den bliver oprettet. Men naar Planen foreligger, saa bør man dog nok tage sin Stilling dertil. Og her forekommer det mig, at Skolen, efter den Stilling, Landbruget indtager i vort Erhvervsliv, er vel saa stort anlagt. De enkelte Kursus skal ikke være kortere end ca. 1½ Aar. I det første Halvaar skal der undervises i alle almindelige Skolefag, Kemi, Fysik, Dyrelære, Redskabslære, Tegning, Fiskeri, Husflid samt Gymnastik, i det andet Halvaar Plantelære, Landmaaling og Nivellering, Geologi og Jordbundslære, Jordens Grundforbedring og Bearbejdning etc., Landboret, Regnskabsføring samt skriftlige Udarbejdelser, i det tredie Halvaar foruden de hernævnte Fag Lægemsøvelser. Endvidere skal der opføres Skolebygninger, indbefattende Bolig for Forstanderen til 40 Elever. Jeg tror ikke, vi tør regne med saa stor Tilgang af Mennesker, der vil ofre saa megen Tid og Udgifter paa Opholdet der. Men jeg haaber, at Skolen bliver oprettet og kommer til at virke efter sin Hensigt og Formaal, og at man, om der i enkelte Retninger skulde begaas Fejl til at begynde med, forstaar at rette dem i Tide. Jeg forudsætter tillige, at Skolen anlægges, saa at den efter Omstændighederne kan udvides. Et andet Punkt, hvori jeg ikke er enig med det samlede Udvalg, er Spørgsmaalet om, hvor Landbrugsskolen skal bygges. Jeg er klar over Fordelene ved en saa central Beliggenhed som mulig, og at det i visse Henseender vil være heldigt, om den kunde anlægges i eller ved Thorshavn, men efter at have set paa den Ejendom, hvorom her er Tale, er jeg kommet til at tvivle stærkt paa dens Anvendelighed til dette Formaal, og jeg kan derfor ikke stemme for Højvigsgaarden som Anlægssted; den egner sig ikke til en saadan større Landbrugsbedrift. Hertil kan selvfølgelig svares, at jeg jo ikke er Fagmand og følgelig ikke kan have saa stor Forstand derpaa, men i visse Tilfælde bør man af den Grund ikke undlade at gøre sin Anskuelse gældende. Jeg agter derfor at holde fast ved Lagtingets Beslutning om Skolens Beliggenhed paa Kjalnes.

J. Paturssøn: Ordførarin hevur hildið ein langan fyrilestur um búnaðarmálið yvirhovur og sjálvur havi eg fyrr tosað nógv um hesa sak og hesi mál — Tí her er ikki bert talan um búnaðarskúlan — so eg skal gera heldur stutt av. Tað var framhildið av ørðføraranum, hvussu hetta mál er gingið gjøgnum árini, ið farin eru, til tess tað kom á tann stoðin, har tað nú er. Sandingar- og Vágamenn vendu sær til tingið við umsókn um at fáa ávirt ein slíkan skúla, búnaðarfelagið tók sakina uppaftur í 1915 og seinniðis kom tað so vítt sum tað er. Eg skal nerta eitt sindur við tað, sum búnaðarfelagið hevur við hetta mál at gera. Áðrenn búnaðarfelagið tók sakina upp vendi tað sær til Íslands, Noregs og Dan-

markar til at fáa leiðbeiningar. Og við kgl. danska landhusholdningsselskapið hevði Bóndafelagið nógvar tingingar. Hetta danska felagið setti eina nevnd sum gjordi eitt álit, sum bleiv sent til Bóndafelagið. Tað er spell, at tað álitið ikki eisini liggur frammi her nú; tí eftir tí, sum her er borið framm, sýnist tað sum um hendan nevndin kom ílag av tí, at tingið sokti um ráð í hesi søk. Men tað er ikki; tað var av Bóndafelagsins atvoldum. Eg vil vísa á hvat nevndin skrivar til Bóndafelagið 5. mei 1915. Eg vil lesa tað upp til at vísa, hvussu undarligt tað er, at nevndin hevur skift stoðu, tí hendan nevndin her ikki tað sama fram í 1915 sum nú er. Man tykist, at tá tað sæst at nevndin hevur eina stoðu í 1915 og eina aðra í 1918, so má man hugsa um, hvør stoðan er tann beina. Nevndin skrivar til Bóndafelagið, »at der arbejdes hen til at finde en yngre begavet og landbrugskyndig Mand, som med Støtte herfra fra søges bibragt den nødvendige Uddannelse, saaledes at han kan forestaa Oprettelsen og Ledelsen paa Færøerne af den paatænkte Landbohskole og Forsøgsstation«. Tað var tankin hjá hesi nevnd, at tingið og Bóndafelagið skuldu velja menninar, sum standa skuldi fyri skúlanum. Nú eru teir av aðrari meining. Nú skal Bóndafelagið burt, og tingið skal bert hava ein mann at seta. Hetta er nevvan komið framm av saklígum grundum. Tað er spell, at hesir menn hava tikið aðra ætlan. Eg skal taka framm eitt og annað, sum finnist í hesum »Betænkning fra det af kgl. danske Landhusholdningsselskab nedsatte Udvalg«. Á síðu 4 vísist á at Bóndafelagið var biðið um at fáa pláss til skúlan. Eg var í tí nevndini, sum tingið setti og var við at leita eftir plássi til skúlan. Tá so danska nevndin kom hígar helt og ikki at hon skuldi leita eftir plássi. Um teir hava gjort tað, so have teir ikki farið væl um, tá teir koma til tað, at Hoyvík mann vera besta pláss: tí tað eru mong pláss, sum eru betri. Mer dámar annars væl frágreiðingina, tó at teir har have verið alt ov beinhildnir á tol, sum teir hava sað fyri sær. Teir hava framhildið, at tað í Føroyum ikki kann roknast at fáast meir enn 4,7 tunn. av ephum av 1 tunnu av sæti. Vit vita, at miðal úrtøkan er meiri enn so. Síðani have teir víst á at ein kúgv í Føroyum ikki gevur meiri enn 600 pottar árliga. Tað er av lítið. Eg minnist ikki betri, enn at R. Effersøe í sini bók setti 900 pt. Kýrnar kunnu ikki mjelka 300 pt. minni nú enn fyri 30 árum síðani. Hetta er sagt fyri at vísa, at hesir menn ikki ganga nóg gjolla framm og ikki fyri at klikkja teir. Á síðu 6 sigir nevndin: »I Henseende til Forsøgsvirksomheden er Forholdene paa Færøerne saa afvigende fra det øvrige Land, at de ved Forsøgene herhede indvundne Erfaringer ikke kan overføres paa disse Øer«. Hetta er beint talað, og tað hevði verið heldugt, um teir altíð hevdu tílíka skoðan, tá teir skulu seta menn til at rokja verk her á landi. Á síðu 8 sæst, at nevndin gongur út frá, at Føroyingar skulu rokja skúlan. Teir siga her: »Da det næppe kan forudsættes, at der findes Personer, der paa Forhaand og i enhver Henseende er fuldt kvalificerede til at overtage de paagældende Stillinger, skal Udvalget henstille, at det, saa snart der er sikre Udsigter til, at Sagen vil blive fremmet, bringes til Offentlighedens Kundskab, at der paa et nærmere angivet Tidspunkt vil blive l. Eks. 3 eller 4 nærmere angivne Stillinger at besætte ved Færøernes Landbrugs- og Husholdningsskole og Forsøgsstation«. Á síðu 9 bera teir framm um húshaldsskúlan og úttala, at har má vera eitt komufólk at standa fyri. Tað er ivaleyst heilt beint: men tað er undarligt, at hetta úttalilsi júst sum deðan burtur úr sakini seinni. Skal tað vera so, tá má tað vera eitt føroyskt komufólk, sum skal standa fyri húshaldsskúhanum, ein kvinna, sum ikki bert hevur lært úti, men eisini eigur rót í føroyskum húshaldi og tekur tað kynstri til hrúks, sum har er niðurnevað; tí á tað skulu okkara føroysku heim byggjast, og ikki bert á tað sum nýtt er. Nú kemur hendan sak til 3. viðgerð, og eg vil vanta, at tað verður givið nóg mikið av peningi til, at ungir Føroyingar hædi heiman og burtur kunnu útlæra seg til at taka við hesum gerningi. Eg vil heldur, at húnaðarskúlin bíður í nokur ár til vit sjálvir eiga menninar, enn at vit skulu taka teir aðrastaðnis frá: tí og vænti, at slíkir ikki koma væl frá tí. Eg vil vísa á síðu 10 har tað stendur: »Idet man forudsætter, at Skolen oprettes og for en væsentlig Del drives for Statens Regning, gaar man ud fra, at den underlægges en særlig Styrelse, hvis Medlemmer formentlig passende kan vælges dels af Lagtinget, dels af Landboforeningen og med Amtmanden som selvskreven Formand. Under den anførte Forudsætning vil det derhos være naturligt, at der øves et lagkyndigt Tilsyn fra Regeringens Side i Lighed med det Tilsyn, der finder Sted med statsunderstøttede Højskoler og Landbrugsskoler herhede«. Soleiðis var stoða nevndarinnar til 1918 og til og fór heim úr Keypmannahavn. Men síðani er eitt k

komið í vegin. Eg havi hildið fast uppí tað, sum hendan nevndin úttalaði í skrivilsi hennara av 25. mei 1918. Eg vil ganga við til tað, at tað verður løgtingið, sum velur hesar menniðar, men at sakkonur maður verður settur av ministerium til at eftirhyggja skúlan. Eg havi ikki sæð eina einasta sakkons grund til, at tað skulu danskir menn til at fyristanda hesum skúla. Nakað annað er, at vit skulu kunna søkja ráð hjá donskum og norskum monnum. Hendan nevnd gongur í hesum síniym uppskoti av 4. marts 1919 beint ímóti sini støðu í 1918 uttan at geva nakra sum helst grund fyri, hví hon gor tað. Á síðu 11 talast um at seta ein djóralækna við skúlan. Har hevur eisini Bóndafelagið havt sín lut í. Bóndafelagið hevir haft sín part í at vit fingu djóralæknan til landið, og eg vildi hildið tað verið hent, um hann kundi verið lærari við skúlan í anatomi og øðrum lærugreinum. So sakni eg nakað her; vit hava hildið fram tað beina í, at tað verður givin stadningur til ungar menn og kvinnur, ið fara út at læra. Harum haldi eg, tað eigir at vera framsett uppskot. — Eg nevndi, at her stóð, at kýrnar góvu ikki meir enn 600 kg, tað er ikki beint. So er tað tann frágreining, teir geva um plássið. Teir hava verið ynsa staðni í Føroyum og halda teir Hoyvík vera tað besta plássið. Men eg kann ikki halda tað vera beint, tí Hoyvík líkist ikki hinum bóndabrúkum í Føroyum. Um tað skuldi verið, at næmingarnir á skúlanum skuldu lært treðarbrúk, so er tað ikki so galið, men er tað ætlanin, sum eg trúgvi, at teir skulu læra bóndabrúk, altso alment hagabrúk, so lóskar tað ikki. Eg haldi ikki, at Kjalnes er tað besta pláss í Føroyum til skúla, men tað er nógvar ferðir betri enn Hoyvík. Hvar vit fara at kanna eftir í Danmork, Noregi, Íslandi, ongastaðni finna vit nakran búnaðarskúla við ein stóran bý; í Danmørk liggja teir kanska við ein statiónshý sunnir, men tað vil eftir okkara viðurskiftum svara til, at skúlin skuldi ligið í Kollafirði. Betænkningin sigir: »At overføre Erfaringer fra Danmark til Færøerne lader sig ikke gøre«. Hetta eru teir klárir yvir, og tó vilja teir nú hava alt eftir donskum mynstri og skipað frá Danmørk. Teir søgdu í nevndarálitinum, at stýrarin skal lønast fyri ein stóran part av tí avlopi, ið fæst av garðinum; hatta gera teir í Danmørk, men ikki í Noregi og í Íslandi, har hava stýrararnir fasta løn. Hitt vil føra til, at stýrarin vil dríva á dreingirnar meira enn gott er; eg haldi tí hann eigir at hava fasta løn. — Tað er fastsett sum tíð til eitt skeið tveir vetur og eitt sumar. Eg haldi, at tað óivað vildi verið nógvir næmingar, ið halda seg hava ráð til eitt styttri skeið, men ikki kunnu vera frá heiminum tveir vetur og eitt sumar. Teir meina, at einki er gjort í Føroyum at retta seg eftir; teir meina alt er her í einum allisbróki. Tað er ikki so. Her eru gjordar royndir í Føroyum, men tað er einki gjort fyri at samarbeiða royndirnar og draga tá fulla nytta úr teimum; tað almenna hevir ikki givið nakrar stuðning til hetta, og eg trúgvi, at tað vildi verið eitt rættuligt gott úrslit úr einum slíkum samarbeiði. Teir halda alt vera ringt her í Føroyum. Eg havi eisini gjøgnum tíðirnar set nógv skrivað um føroyskan búnað, ið tykist mest skrivað fyri at stuttleika Danskarum, frásagnir um, hvussu afturlaga vit standa: men tað eru ikki samferdigar frásagnir av tí virkuliga standi. — Tað er ikki nevnt her í nevndarálitinum, um tað skal leggjast nakað dent uppá heima yrkið, so sum tað hevir verið her í Føroyum, eftir mínum tykki til ónotuligt gagn fyri landið. — Tað standur her, at seyðurin roktar seg sjálvan; tað er ikki beint. Tað er sjálvandi beint, at einstok stoð er einki gjort fyri at lívga um seyðin, eingi seyðahús, men tað er tó í ógvuliga nógvum plássum. Sjálva hagaskipanina hava Føroyingar skil uppá. Føroyingar hava roktað seyð í 1800 ár og teir hava lagt nógvan dent uppí seyðarokt: tað besta dømi harum er seyðabrøvið, hin gamla lógin um hetta evni. Tað stendur í álitinum: Græsarealet udnyttes ikke efter nogen bestemt rationel Plan — jú, tað verður gjort; teir hava summarhaga og vetrarhaga og ansa væl eftir, at allur hagin verður passaliga beittur; hvort fylgi skal hava sítt bestemta mark at útnytta. Hetta er ein skomm fyri Føroyingar at lesa. — So stendur: »Hvis Færeøernes Mangler skal afhjælpes, maa der ske en Deling af Udmarkerne. Eg dugi ikki at siggja, hví tað skal vera nevðugt; eg haldi ikki at sjálv hagaroktin kann vera øðrvísi. Nakað annað er, hvat ið kann gerast fyri at lívga seyðinum í lembingartíðini, ansa eftir góðari sleppitíð, ansa eftir góðari allferð o. s. fr. Um tað varð sett fram, hvat 3—4 av teim bestu seyðamonnum meina um hetta, vildi man verið bilsin við at siggja, hvat skil Føroyingar hava uppá seyðabrúk. Men tað er so vorðið í Føroyum, at sjálvt um menn hava skil uppá, hvussu seyðabrúkið í ollum átti at verið, so eru teir ikki mentir at útinna tað, tí teir fáa einki fyri teirra arbeiði. Tað hevir í mínari tíð fingist nógv

ov lítið lurtur úr fyri hetta arbeiði, seyðamenn hava haft nógv ovlítla lon, mun hevir ikki givið seyðinum hoyggj, stutt sagt, tí man ikki hevir haft rið til tess.. Viss tað vísir seg, at tað loysir seg naestan líka væl at ganga burt í haga, sum at nógva út, viss tað loysir seg naestan líkavæl at byggja garðar, rudda haga, bróta grót, stutt sagt: dríva jarðabrúk sum at dríva sjóbrúk, so vil alt lutta koma av sær sjálvum. At eitt reyndarbrúk eisini í so máta vil verða hent ivist eg ikki í; Skotar og Íslendingar duga mangt kynstri við seyðabrúki, sum vit kunnu taka eftir. Men sigið ikki, at Føroya bondur hava verið blindir fyri hesum. Longu í 1885 sendi eitt bóndi umsókn til tingið um studning til at fáa ein skotskan seyðamann til Føroyar. Tingið noktaði -- sjálvsagt. Nei, bondurnir hava fullvæl sæð, hvussu neyðugt tað var at fáa sær dyggan kunnleika í hesum máli, og tað siggja teir enn tann dag í dag. -- Eg kann ikki ganga við til ta stoðu, hin danska nevndin er komin til, nú, men vil halda meg til ta stoðu, nevndin hevði 28. mai 1918. Síðani er hon fallin frá bæði at bóndafelagið og at logtingið skuldi útnevna menn til at standa fyri skúlanum. Høvuðsatvoldin til hetta var ikki tann sakliga, at vit engar menn áttu í Føroyum so fregar, men tann, at bóndafelagið var so illa útspilt av tí farna umtmanni og tí núverandi fútanum; hesir báðir embætismenn hovdu sagt ósannheit fyri ministeriinum. Hegar vórn tíðindir borin gjognum hesar menn at bondafelagið hevði borið seg illa at, hevði svikið eitt álit, sum ministeriið hevði á tí, og tað var tí einki at siga til um teir donsku búnaðarmenn kvepdu seg við og sogdu, at so vildu teir einki hava við bóndafelagið at gera. Umframt tað, at felagið hevði borið seg illa at við teim pengum, sum ministeriið hevði givið tí uppí hendur -1000 kr. til smorri jarðabrúkarar í Føroyum, var tað framhildið, at bóndafelagið bara var eitt handilsselskap, sum virkaði spillandi fyri handilslívið her á landi. Tað var serliga landfútin, sum fordi hatta fram. Tað er sjálvsagt ongatið gott at forsvara seg, tá ein ikki veit, hvatið sagt verður á bakið á einum, og vit hovdu einki annað at verja okkum við enn at leggja fram greiðligt rokuskap, id sýnir, at vit hovdu brúkt hvørt oyra av hesum peningi til tey mál, hann var ætlaðir. Ja, tað var omtá sagt, at vit hovdu sett upp treytir um at fyri at fáa stuðning av hesum peningi, skuldi ein gerast limur av felagnum! Vit hava ongatið lagt dulsmál á, at vit eru handilsfelag; vit hava selt til aðrar og keypt inn frá, tað, set, men ongatið hava vit eins og bráksfirmuningar aðrastaðni selt húsdjelmingsvorur og hur við konkurrera við aðrar keypmenn. Vit hava reynt at gera mun millum góðar og ringar føroyskar vørur og fáa teimum betri prís. Bóndafelagið reisti spurningin um at fáa okkum ein nýggjan búnaðarráðgevara, tá hin gamli fell frá, tað hevur líkið uppaftur spurningin um búnaðarskúla, um djóralækna, um tryggingarfelag, um at fáa ein seyðamann úr Íslandi og fáa ílag eitt búnaðarblað, umframt tað at vissa jarðabrúkarum lagalig lán. Tað kann tí als ikki sigast, at vit arbeiða hara fyri at dríva handil, okkara hovuðsuppgáva er og hevur verið at fremja jarðabrúk í Føroyum. Men vit tóku handilsskapin uppi, tí tað var trupult at fáa menn nógnógvar at vera í felagnum uttan at har kundi verða nokur fortjenesta burtúr. Men hetta felagið er vorðið so illa avmálað harniðri, at hin danska nevndin kvetti seg frá tí og samstundis kvetti hon seg frá logtinginum við. Vit minnast jú frá ifjor, hvussu bóndafelagið var kallað eitt bóndafangarafelag og kravt av tí, at tað skuldi leggja sini rokniskapir fram fyri tingið. Tá vistu vit ikki, hvussu rótfrekar rotur hendu spillan hevði. Vit hovdu góða samvitsku og tagdu tí til tað mesta. -- Men tað er enn sum áður: Tá Føroyingar skulu gera nakað í Føroyum, so verða teir útspiltir, gjørdir so lítið verdir sum mogudigt; teir, ið gera nakað skulu her á landi, mugu vera Danskarar. Slíkt er ikki at seta mót í teir ungu menn her á landi, sum fegin vilja virka. Iaðer lurta at taka alt dirvi frá okkum. Istaðinfyri at tann lítli neisti, her kyknar upp, átti at verið livgaður, verður hann kvarlur. Allarhelst kann hetta sigast um allar framburðsreynslir fyri jarðabrúkinum. Taka bondur seg saman, fáa teir slíka skolan útyvir seg sum einans kann samanberast við, tá ein stoytir út ilsut, og ikki vil nevna, men um keypmenn, fiskimenn, skómakarar, skúlalærarar taka seg saman í felog, tað verður aldri talað um. Eingin standure er so happaður, ja líkaháttu vanvirdur í Føroyum sum bondurnir. Tá reyndarbrúkið í Kirkjubø helt uppat vard bodið fyristoðumannunum 800 kr. um árið fyri at halda fram við hesum starvi; hann segði nei. Nú verður bodið fyristoðumannunum túsund av krónum, men nú sloppa Føroyingar ikki framat! Um vit siga, at danskir menn duga at dyrka betur enn Føroyingar, so seti ein danskan mann á eitt bræd og lat hann rógva út eisini. Ella lat-

hann fáa nju bóndagarð við bjarglendi og skalvi og tílíkum. Eg havi lært ikki at vanvirða góð ráð og tey vil og fegin hava frá monnum sum í vissum greinum eru fremri enn eg, eisini frá donskum monnum sum øðrum. Men eg kann ikki seta danskar menn hagri enn meg til at dríva jarðabrúk í Føroyum. Eg sakni eina frágreiðing um, hvussu teir hava skipað seg í Noreg, Íslandi og Skotlandi við slíkum skúbum, og eg sakni, at eingin av hesum monnum hevur verið sendur til Føroya at fáa greiðu á okkara búnaðarviðurskiftum. Vit hava nógv at læra av donskum jarðabrúki, men tað mesta av tí kann ikki beinleiðis nýtast her. Eg framhelt tí ógviliga nógv í nevndini, at maa átti eisini at fara og heinta kunnleika úr grannalondum okkara. Eg eri ikki komin við hesum fyri at fimnast at donsku ella føroysku nevndini ella einstøkum monnum, men fyri at framhalda mína hugsa um hettar mál.

Formaðurin: Den sidste Taler sagde, at den forhenværende Amtmand og den nuværende Landfoged har givet usandfærdige Erklæringer vedrørende denne Sag. Denne Udtalelse er ligesaa urigtig som utilstedelig.

J. H. Poulsen: Effersoe segði, at tað persónliga yvirlitið, sum eg gav, var ov mikið persónligt. Tað er nakað turrligt at skildra históríu og ikki nevna persónar. Hann meinti, at eg vildi kasta ein skugga á Schrøtar. Eg haldi ikki, at eg havi gingið Schrøtari ov nær. Hann hevði jú tá longu at skula ganga í hóslag við símum diametrala mótstøðumanni: O. Jacobsen í Kvívík. Effersoe meinti, at skúlin er ov stórt umlagdur; men tað kemur av tí, at hann er ætlaður at vera í tveimum deildum. Tað var fram hildið í Keypmannahavn, at um skúlin ikki væntast at kunna fáa fleiri fyri í húsmenn, so var hann meir enn nógv misseydnaður. Tað skuldi kunna vera 30 næmingar í krovji deild; onnur deildin skal vera fyri træðarmonnum onnur fyri stórri jarðabrúkarar. Men hetta kann altíð broytast, um tað er neyðugt. Patursson umrøddi ein dóm, sum gongur móti okkara innstilling í sakini. Hann framumhevar eitt mótsetningsforhold millum danskar og føroyskar menn. Mín fatan av hesum donsku monnum er, at teir hava interessu fyri sakini og vilja gera, hvat teir kunnu fyri at fáa meiri útuv okkara jarðabrúki. Tá teir vóru hernppi, tá var góðveður og nátúrin var fagur og blíð og tað kundi hava tann ávirkan, at teir hildu korini her verða ein nan hagaligari fyri jarðabrúk enn tey av rottum ero. Tað stendur á síðu 46, at teir ynskja, at man við fardastudningi gevur ungum Føroyingum líkindi at fara út og læra í Danmark og í grannalondum okkara. Og teir vænta, at Føroyingar sjálvir tá nokar ár eru gingin skulu stýra skúlanum. Men teir siga at til forsoksleiðarar noydast tit at taka danskar menn, tí teir meina, at menn, sum duga til hetta eiga vit ikki. Vit eiga ikki beinanvegin at yvirføra royndir úr Danmark til okkara, men royndarhættirnir mugu kunnu brúkast.

J. Patursson: Eg vil loyva mær at svara fá orð til tann bemerkning, sum amtmaðurin gjordi viðvíkjandi tað eg segði um útbúlsini hjá fyrverandi amtmanni og núverandi fóta og feirra imbæratning um Føroya bóndafelag. Eg skal ganga við, at tað eg segði, var usatilstedeligt, men ikki, at tað er urigtigt. Tað er ein rangvorg frammistilling, sum teir hava lagt fram, og her havi og brúkt eitt ógviliga lint føroyskt heiti.

J. Samuelsen: Eg havi haft við hesa sak at gera í fleiri ár í tinginum. Eg eri fegin, at vit eru komnir so langt og at vit kunnu fáa tað sum til skal fyri at fremja sakina, peningar. Og eg eri fegin, at tingið skal taka stoðu til, hvar skúlin skal liggja. Eg og fleiri tingmenn meina ikki, at vit vilja broyta ta viðtoku, sum varð gjord í 1917 og sum gekk út uppá at skúlin skuldi vera á Kjalnesi. Eg eri sinnaður til at siga, sum vit sambandsmenn yvirhavur: vit vilja ikki broyta ta stoðu, logtingið tók í 1917; vit ynskja skúlan á Kjalnesi. Teir framføra onga vektiga grund fyri tí plássi. Tað einasta kann vera, at tað fínansielt seð verður líligari, við tað, at man fær líligari leraraar, men tað kann kortini ikki vera tað avgerandi. Tað viktigasta fyri okkum er ikki at spara 500 kr., men at skúlin kann drívast á best moguligan máta, tí meini eg, at vit skulu halda uppá tað, vit samtyktu í 1917, og eg haldi tað vera unðurligt, um vit skuldu broytt ta stoðu, tingið tók tá. Sakin hevir verið til umroðu nestan hvørt ár síðani landbukommissiónin gav betenkning, og vit hava tí haft eini 7—8 ár at spekulera yvir, hvar skúlin skal vera, so eg haldi ikki tað kann kallast óyvirlagt, um vit leggja hann á Kjalnesi. Um eg visti, at hetta vildi sligið sakina ihel, vildi eg tíkið eina aðra stoðu, men eftirsum eg fursíóð mennirnar, meinti eg ikki, at plássið var so ógvuliga eingt. Vit skulu sjálvandi taka nakað hensyn til, hvat dugandi menn meina, ið skulu arbeiða

saman við okkum, men vit mugu eisini taka hensyn til, hvat vit meina sjálvir. So eri eg á einum punkti einsamallur um eitt uppskot. Eg meini, at í tí útvalgi, ið skal leggja vandrilæraravirksomheitina til rættis, skal vera 5 limir og ikki 3, sum fleirtalið fyrisiar. Eg meini, at 10 eygu síggja altið betri enn 6. Vit hava her á tingi sett útvalg saman eftir tí betýdning, sakin hevir haft, og táið tað hevir verið rættuliga stórar sakir, hava vit haft enddá 9 manna útvalg. Eg meini, at hetta útvalg, ið skal leggja grundina til hesa skúlavirksomheit, er so ógvuliga viktugt, og eg vóni, at tingið vil umbýta teir 3 mennirnar við 5. Eg kann ikki avhalda meg frá at siga nakað til teir menn, ið eg havi ætlað at svara, sjálvt um teir eru rýmdir út úr salinum, eg eri nú so vanur við, at hesir menn fara út táið eg tali, og eg vil tí tala til referatið og so kunnu teir jú lesa tað, um tað verður niðurskrivað. Eg vil fyrst siga nakað til tær historisku upplýsingar, sum orðførarin gav. Eg haldi tað vera nakað óforsiktugt at fara og greiða frá okkara landbrúkshistórin, tí tað er givið, at menn harum er ikki einigir. Tvørturímóti síggja menn so heilt ymist uppá hetta. Eg eri netupp akkurat stikk tvørturímóti, hvat tingmaðurin úr Skopun segði. Um royndarskúlan ið var í Kirkjubø haldi eg, at hann var drivin akkurat soleiðis, sum ein skúli ikki skal drívast. Tað hevir eisini verið soleiðis, at teir menn, ið hava dugað nakað jarðabrúk her í Føroyum, og vit hava tó dugandi jarðabrúkarar, teir hava altíð hildið seg vekk frá tí skúlanum og teir hava ansað sær vael fyri at taka eftir honum. Tað hevir verið tosað um, at tað at koyra við vogni í Føroyum skal vera komið frá skúlanum í Kirkjubø; eg trúgvi, at Føroyingar máttu haft lært tað av teirri tíð, teir liva í, uttan at hava verið í Kirkjubø. Tað eru nógvir Føroyingar, ið hava verið í Danmork, Skotlandi, Noregi og hava lært landbrúk, og har hava teir sæð fólk brúka vognar. Lat okkum ikki í hesum forbindilsi tala um tingmannin úr Kirkjubø. Sum landbrúkara má man helst ikki tosa um tann mann. Hann hevir nærmari fort okkara landbrúk aftur enn fram. Líkasum hann hevir fært sín egna garð aftur eftir, samanlíknað við, hvat hann var fyrr. Her var ein dagin tala um ein vogn, ið datt omman; tað var jú slett ikki tala um tað; tann maðurin, ið sipaðist til er ikki vanur til slíkt, hann vildi ikki latið vognin dottið í grøvina og so farið frá honum og latið hann vera liggjandi har; tað líkist ikki ti mannimum. Eg skal ikke koma inn uppá, hvat hin fyrri landbrúkskonsulentarin hevir virkað fyri Føroyar; og veit, at tað frá einari síðu verður gjort alt fyri at reducera, hvat hann hevir gjort: men eg trúgvi, at um hann ikki fekk gjort alt tað, hann hevði hug til at gera, so var ikki oll skyldin hansara og langt frá tí. Orðførarin segði nakað um, at bóndafelagið hevði reist sakina aftur; eg kann ikki siggja, at bóndafelagið hevir gjort tað minsta fyri sakina; tingið helt seg ikki kunna gera nakað við hesa sak, tí tíðirnar vóru so ringar; so sokti bóndafelagið og tingið svaraði, at um teir vildu gera nakað sjálvir, vildi tingið taka ímóti teirra gerð. Bóndafelagið hevir ikki haft spor imiftydilsi uppá hesa sak. Tingmaðurin í Kirkjubø tosaði um ta donsku kommissiónsbetonkningina. Løgtingsmenn hava allir fingið eitt exemplar og eg haldi, at tað hevir verið heilt hugnaligt at lesa, men eg haldi, tað ikki vera beint at taka einstøk pettí burtur úr og gera atfinningar til tey. Tingmaðurin úr Kirkjubø hevur funnið nakað í betonkningunum, sum hann er so sera glaður yvir: kommissiónin sigur, at man ikki beina vegin kann yvirføra tær erfaringar, sum gjordar eru niðri í Danmark, uppá okkara forhold! Nei, sjálvsagt, men tað betýðir so sanniliga ikki, at táið maður heintar sær erfaringar frá donskum landbrúki, so nytta tær honum ikki nakað í Føroyum. Eg havi hoyrt menn siga, sum hava fingið sítt útdanmilsi aðrastaðni, at oin als ikki beinavegin kann yvirføra sínar erfaringar frá *norskum* jarðabrúki til føroyskt. Ein fornuftigur maður vil vita, at lempa tað ið lempast skal, so tað verður hóskandi. — So sigur tingmaðurin úr Kirkjubø, at fyri so vítt vit ikki kunnu fáa serliga kvalifiseraðar menn í Føroyum til at dríva skúlan, mugu vit heldur lata tað heila bíða. Tað haldi eg ikki er rett: vit mugu ganga útfrá, at her eru menn, sum saman við øðrum landbrúkskonum monnum kunnu fáa nakað útav tí, og eg hopi, at Føroyingar eru so dugnaniklir, at teir eftir hondini vinna sær teir bestu sessar sum leraran í føroyskum landbrúki. Men í eygabliksins hava vit ganska víst ongar menn, sum kunnu setast á odda. - Tað hevur verið sagt her fyrr, at landstingið í 80'unum kvaldi hesa sak, tí teir sogdu: Hvat skulu Føroyingar við ein sovorðnan skúla! Teir hava jú ongar menn, sum duga at leiða hann. Tað er landstingið hlívið sterkt kritiserað fyri, men skulu *vit* nú fara og siga tað sama, nú landstingið hevur fingið ein annan uppfatan? Eg haldi onstan vit mugu hevda tað mótsatta uppfatilsi.

Táið forholdini virkuliga eru so, at vit ongar menn eiga, ja, so mugu vit netupp skunda okkum at fáa okkum skúlan, so Føroyingar, sum skjótast kunnu koma so víðt, at teir kunnu setast á odda. Dettur sakin nú niðurfyri, so skulu vit natúrligvís aftur hoyra tað vanliga tosið um, at Føroyingar reistu hendа spurning fyri 30—40 árum síðani, men aldri eitt orð um, at tað var í løgtinginum, sakin var dripin. Nú mugu vit fáa nákað burturúr, annars skal tað sláast fast, at tað eru vit sjálvir, sum forkoma spurningunum; vit og ongin annar skulu bera skyldina. — So minnir tingmaðurin úr Kirkjubø á, at kommissiónin hevur skift støðu fyri og aftaná jól; frammanundan jólum vóru teir á einum máli við tingmannin úr Kirkjubø, men aftaná jól fekk pípan eitt annað ljóð! Tað var tó keðiligt, at tingmaðurin fór heim til jólar; hevði hann blivið verðandi harniðri, so var henda ólukka ikki hond. Eg forstandi ikki, hví kommissiónin skal hava skift anskuilsir, meðan hann var heima í jólaferin — tað kann ljóða sum hann vildi insinuera nakað móti einum, sum ikki fór heim til jólar. At kommissiónin hevur skift anskuilsir viðvíkjandi bóndafelagnum, haldi eg tó ikki vera undarligt. Tingmaðurin úr Kirkjubø sigur, at teir hevdu fingið at vita, at bóndafelagið var eitt vánaligt felag, tað skal vera greitt fyri teimum av einum kommissiónslimi, kandidat Jakas, at hetta felagið hevði svikið«, meinti eg hann sogði, og at tað var tí, teir ikki vildu hava nakað við tað at gera. Eg havi ongatið hoyrt kandidat Jakas greiða frá nokrum slíkum, og eg kann heldur ikki teinkja mær, at tað skuldi verið tann rætta grundin til, at teir ikki vildu hava við bóndafelagið at gera. Nei, teir hevdu hoyrt, at hetta felag var eitt handilsfelag, og tað mátti man væl hava lov til at lata teir vita; so hava teir tikið sína støðu hareftir. Eg vildi eisini funnið tað aldeilis órímiligt, um teir lótu tað bóndafelagið, vit kenna, fáa nakað innflytilsi uppá loiðilsi av landbrúksskúlanum. Okkum kunnugt er hetta felag ikki annað enn nakrir bestýrilsislimir og ein kjøthandlari í Havn. Men mann kann tó ikki lata ein slíkan kjøthandlara fáa innflýtilsi uppá skúlans leiðilsi. Hava teir sakkonar menn, so stendur tað teimum frítt fyri at fáa hendа sakkonskapin representeradan í nevndini. Annars hava Føroyingar vissu fyri at fáa ein sakkonan representant við skúlan í landbrúkskonsulentinum, sum jú er fastur limur av nevndini. Hesir donsku menninir, sigur tingmaðurin í Kirkjubø, hava eitt forkert sýn uppá vmisk forhold, navnliga hvatið seyðabrúkinum viðvíkur. Hvar teir hava fingið sínar upplýsningar frá, veit eg ikki, men hann hevur jú havt nógv við kommissiónina at gera, so tað liggur nær at samtaka, at teir hava fingið sínar upplýsningar um seyðabrúk frá tingmanninum úr Kirkjubø. Og tað vita jú allir, at *hann* hevur ikki stórt skil uppá seyðabrúk, — í tí er hann mynsturmaður: at drýva seyðabrúk, sum tað *ikki* skal drívast. Annars sigur berættmingurin, at Føroyingar bera tað í leypi og hoyggj í byrðu á bakinum — og veit ikki, um tað er so grúiliga skeivt —; at seyðurin gongur úti bæði vetur og sumar og sjálvur má skaffa sær skjól, tað geldur nú bara í teimum høgum, hvar lítil rokt er. So sigur tingmaðurin í Kirkjubø, at ongin skal siga annað enn at Føroyingar hava forstand uppá at rokta seyð, tí teir hava røktað seyð í 1000 ár. Eg ivist ikki í, at Føroyingar, nógvir Føroyingar í hvussu er, hava forstand uppá seyð, men tann umstendigheit, at teir hava røktað seyð í 1000 ár, beinvirr ikki at hetýða stórt nú á døgum. Eg kundi tonkt mær, at hann hevði sagt fyri kommissiúni: Soleiðis driva Føroyingar teirra seyðabrúk, men hjá mær er tað oðrvísi! Tað hava teir sjálvsagt ikki vilja trú uppá, at seyðabrúkið í Føroyum yvirhevur skuldi verið so ringt sum í Kirkjubø. — Men hví hevur tingmaðurin ikki talað at harniðri, hví hevur hann bíða til hann kundi standa her í løgtinginum og geva kommissiónini ábreiðslu? Harniðri hoyrdist ikki eitt orð, ikki ein atfinning frá honum — tað hevði tó verið rímiligari, um hann segði tað, hann hevði at siga, uppí eygunum á teimum, enn at standa her og bosa uppá bakið. Tingmaðurin í Kirkjubø sigur, at tað nyttar alt einki við nokrum landbrúksskúla, um tað ikki verður so, at tað kann loysa seg at vera bóndi í Føroyum. Vit hava hoyrt hetta tosið so ofta: at tað loysir seg ikki, teir selja alt ovbíligt o. s. fr. Tað kann vera nakað í tí, at oplir o. t., sum krevur nógv arbeiði, kann vera ivingasamt um tað lonar seg at fáast við, men tú vit so koma til sevðin, so passar tað ikki. Og hann er ella hevur tó verið hovuðsinnlokan hjá bóndunum. Hví lata so bondurnir ikki heldur gardarnar frá sær? Lat okkum seta nakrar útróðrarmenn til at vera bondir ella bondur til at vera útróðrarmenn, ella seta bondur til at vera traðarmenn, og lat okkum síggja, hvussu teir klára tað. Eg skal ikki koma inn á skotskar seydamenn, men úr okkara góðu plassum kann mann

fáa eins góðar seydamenn sum úr Skotlandi Islandi ella Noreg. Men úr Danmark kann einki gott fáast; hettar gongur gjøgnum tolina, sum kemur frá tí mannin, sum talar á bóndafelagsins vegna. Hann sigir, at bóndafelagið er útspilt av fyrverandi umstøðum og núverandi fúta. Eg skal ikki siga nakað um hetta; hettar er átalað av forstøðumonnum. Bóndafelagið er anmeldað til handilsregistarið sum handilsfelag, og formaðurin fyri tí hevur sum bóndafelagsins formaður uppfødt sum handilsmaður fyri tí niðri í Danmark. Hann hevur starvast dúliga sum handilsmaður har. Tingmaðurin í Kirkjubø sigir, at bóndafelagið hevur aðrar uppgávur enn at vera handilsfelag, og hann las upp um nógvar sakir, sum tað hevur tikið sær av nú síst. Hettar er vel av ti, at kritikkurin ímóti hesum felaginum hevur verið so storkur. Bóndafelagið hevur nærmast gjørt tað vanskiligt fyri fólk at fáa varur undir krínum. Men nú er tað gott, at felagið batnar. Tað er gudsbarn, sum batnar. Viðvíkjandi bunaðarskúlamum standur, at tann skipan, sum skal galda, hon skal galda til víðari. Og táið líkindi eru til, at Føroyingar hor kunnu yvirtaka alt, so verður tað eisini soleiðis. Tingmaðurin í Kirkjubø segði, at soleingi tað vóru lítlir pengar at forkjena, so var einki ímóti, at tað vóru Føroyingar, sum skuldi stýra verkunum, men ikki soleiðis tá tað eru nógvir peningar. Man kom fyrr til tað resultat, at tær royndir, sum áður vóru gjørdar her á landi, vóru mislukkaðar, tí at ikki teir rættu menninir stóðu fyri. Eg hopi ikki, at nakm nú kemur til sama resultat, annars verður búnaðarskúlaspurningurin spiltur fyri langar tíðir. Pálursson sigir, at um mann sotti danskar landbrúkarar á eina føroyska trøð, vildu teir doy í hungri. Men eg haldi eisini, at fleiri av okkara bóndum vildu verða beteinkiligir, um teir vóru settir til at dyrka eina ringa trøð. Tílíkar myndir kann mann framseta agitatorisk, tá mann vil genera fólk. Sjálvt Pálursson á sínum stóra garði drívur ikki landbrúk í tann forstand, at hann kann liva av tí jarðabráki, hann sjálvur drívur. Tað er seydurin — sum veksur likt sum gras, sum maðurin segði, — tá hjálpir honum. So faust Pálursson at, at mann frá tí føroysku nevndini ikki sendir menn til Noreg at gera seg kunnugar við ymis viðurskiftir har. Vit hava menn, sum í ár hava verið í Noreg fyri okkum. Leb okkum ikki fáa fleiri tílíkar. Tað var tingmaðurin úr Kirkjubø, sum var har, og úrslitið varð syndarliga ringt. Ordføraren talaði so um, at Schrøter gekk saman við Ole Jacobsen um at taka búnaðarskúlan av. Hann meinti, at politikkur var komin í spurningin. Men eg antaki, at grundin var tann, at Schrøter var skuffaður, tí hann hevði væntað, at tað kundi koma meiri burtur úr skúlamum, meðan Ole Jacobsen væntaði tað frammandan, og hann fekk rætt. Men tá Schrøter sá hetta, tá vendi hann skjót um og endaði ikki fyrr enn yvir við hin veggin. Tað fell mær fyri brósti, at ordføraren átalaði beteinkiligheitir um, at vit kanske einki fingu burtur úr skúlanum, um vit ikki vildi hava hann at vera í Høyvík. Um nakar átti skal vera fyri tí, so mugu vit gera okkurt fyri at prógva, at plássið er gott á Kjalnesi; tí vit mugu ikki gera nakað, sum kann steggja hesi fyritoku. Vit viðtóku í tinginum viðvíkjandi Kjalnesi, at plássið har var forsvarligt; tí har er ikki einans garður, men har eru líkindi at fáa meiri aftrat. Tað kann eisini lætt lata seg gera at fáa timalæraran úr Havn til Kjalnesar. Tað er ikki langt at fara hagar serliga ikki nú tað gongur móti tí tíð, tá hvør maður eigur sín motorbat. Hetta kunnu vit eisini greiða frá í einum tilleggi til hendan betænkningin. Tað er keðiligt, at ein viðtoku, sum var so væl undirtikin í tinginum, nú skal koma fram aftur við tí broyting at taka Høyvík staðinfyri Kjalnes. Viðvíkjandi einum tílíkum spurningi eru vit kanska væl so sakkonir sum tann danska nevndin.

J. H. Poulsen: Eg átti ikki at biðið um ordið, táið rætt skuldi verið, tí vit vita, at sýslumann Samuelsen skal hava seinasta ordið, og tíðin er nú so nógv framliðin, at menn eru farnir at leiðast við. Men tað var kortini nakað, eg noydist at siga eitt sindur til. Sýslumaður Samuelsen segði, at tað var eitt hovuðshensyn fyri at fáa skúlan til Høyvíkar, at so kundi tímmannarar fáast úr Havn. Nei, tað segði eg ikki. Eg segði tvørturímóti, at hetta bert vildi fora við sær nakrar túsund kr. meiri í árligari útreislu, men at hovuðsgrundin var, at Høyvík liggur so nógv meira sentralt. Um eg skuldi tosað sum Sandoyingur, so eru vit í Sandoy langt meira henvístir til at liva av landbúnaði enn á nakrari annari eyggj í Føroyum, men sum Føroyingur bundi eg meg fyri tí heila og yvirskúlan har, hvar hann verður til mesta gagns fyri allum Føroyum, serliga nærindis Havnina. So er tað tann saguligu frágreiðingin, sum A. Sø-

mælsen linnust so at. Effersøe tók tað meira formiftugh, men Samuelsen varð heilt rordur, vit vita frá fyrr. at táið Jóannes Patursson verður nevndur, er tað fyri A. Samuelsen sum at vísa hundi brand. Eg sagði, at tann frammgongd, ið er í okkara landbúnaði stammar frá Kirkjubøgarði, og eg meinti, at tá ið skúlin í Kirkjubø varð stovnaður, tá skeddi eitt umslag í tí gamaldaga lugsunarhátti, ið tá var einaráðandi í føroyskum landbúnaði. Tá varð fyri fyrsta ferð nýtt plógv í Føroyum, fyri fyrstu ferð var her nýtt vognur, slóttumaskina, betri kirnur, fyri fyrstu ferð varð nýtt eitt betri russaslag. Nú sigir A. Samuelsen, tað hevði komið kortini; ja, tað er jú við tí, sum við eggi Kolumbusar, tá hann fyrst hevði fingið tað at standa, dugdu eisini allir hinir. So talaði A. Samuelsen um hin farna landbrúkskonsulentin. Nei, eg vildi ikki reducera R. C. Effersøe, eg setti meiri prís uppá hann enn so, og eg trúgvi, at tað var ikki hansara skyld, at ikki meiri kom burtur úr hansara virki sum búnaðarráðgevari. Sýslumaður Samuelsen sigir, at J. Patursson hevir ongan týdning haft fyri føroyskan landbúnað, ja, við einum sovorðnum óttalitsi slær hann formuftin tann knýtta nevan fyri paunn, og tann agitatión dugir ikki longur í Føroyum, at framstilla Jóannes Patursson sum eitt avskrekjandi dømi í hesum máli. Eg veit ikki, hvussu eg málfordi meg íáðni, tí eg talaði um, hvat teir donsku kommissiónslimir meintu um, hvar skúlin átti at standa. A. Samuelsen segði, at hesir menn hevdu ikki so nógv ímóti Kjalnesi: ein av teimum segði kortini við meg, at hann vildi yvir høvur ikki stemma fyri Kjalnesi, hin, ið hevir undirskrivað betonkningina, var minni bersøgin, og segði, at hann helt Hoyvík vera betri, men Kjalnes var ikki óbrúkandi. A. Samuelsen tosaði um, at man kundi fáa tímalærara úr Havn til Kjalnes; tað verður væl ikki uttan við fljúgvumaskinu. Eg skal ikki taka orðið meira í dag um hesa sak, men mala ollum tingmonnum til at stemma fyri Hoyvík. Hvussu stýrið verður fyriskipað haldi eg minni um nevnt fyri fyrst.

O. Effersøe: Jeg ønsker ikke at faa det sidste Ord, men har dog noget at sige. Hr. Patursson er begyndt paa en Fremstillingsmaade, som han, som sædvanlig, gennemfører med stor Hurtighed, idet han er begyndt at fremholde Bóndafelagið som en Slags offentlig Institution, og samtidig fremhæver han Modstanden fra det offentlige mod denne Institution. Han henviser til en Bestemmelse i »Bóndafelagsins« Love om at fremme det almenes Vele. Hermed har man kun ment at skaffe Selskabet en vis ydre Fernis, saa det kan tale med i offentlige Anliggender. Men man kan ikke komme bort fra, at dette Selskab saa langt fra er nogen offentlig Institution, men slet og ret en Fagforening af Landbrugere. Derfor kan Selskabet med ingen Ret optræde som offentlig Institution overfor Regering og Rigsdag. Vi maa være fri for denne Sammenblanding af en Kodforretning med et Selskab til det almenes Vel. Selskabet er et Aktieforetagende, og dermed maa det forblive.

A. Samuelsen: Ordforarin er úti, men tað ger ikki so nógv, eg eri vanur við tað. Eg skal upplýsa, at ordforarin í 1917 stemmadi fyri Kjalnesi; tað tjenar honum til sóru, tí tað er eitt gott pláss, og tað liggur centralt, og tí varð tað eisini valt. Tað liggur ógvuliga væl fyri sólini og ein partur er har við minni sólargangi, so tað var eitt heilt ideelt pláss til ein slíkan skúla. Tað má vera tað sama í 1919. plássið liggur á sama stadi í Føroyum, líka centralt, og tað hevir væl enn sama pláss í forhold til sólina, so tað er óivað líka væl skikkað til skúla nú sum í 1917. — Eg skal ikki koma inn uppá Kirkjubogarð, men eg vil onganhvønda lata tað uppfatilsi sita á mær, at tann ið sigir, sum eg segði um Kirkjubogarð, hann slær tann samma fornuft fyri paunn; tað eru ógvuliga nógvir Føroyingar uttan eg, sum siga, at tar royndir ið hava verið gjordar í Kirkjubo, tær hava á ongan máta gagnað ukkum í Føroyum, men tvørtur ímóti bert vetið til at fikið seg fakt fyri at taka eftir. Ordforarin sigir, at Kirkjubobúnlin hevir lært Føroyingar at brúka hest og vogn; ja, har hevir verið ein hestur í Kirkjubo, sum logtingið hevir betalt, og tað var illa verðið við honum, hann doyði í raki; Kirkjubobúndin hevir ikki uppfunnið vognarnar, vit hovdu vognar frammanundan, teir komu til Kirkubiggjar, teir blivu bert lítið brúktir. Og kirnur sigir ordforarin eisini, at Føroyingar skulu hava lært at brúka úr Kirkjubo, eg heldi meg minnast, at tað tá kom ein hópur av kirnum úr Noregi til landið, so teir hava nokk lært at kenna kirnur uttan av Jóannes Patursson í Kirkjubo. Eg skal ikki siga meira í dag, sakin kemur jú aftur til 3. viðgerð. Eg havi ikki tað uppfatilsi av monnum, at tann eini av teimum ikki vildi ganga við til Kjalnes og at vit tí kunnu

vilja fáa alla sakina stedgaðs, um vit ikki vilja taka Hoyvík, men her haldi eg, at tann eini maðurin, sjálvt um hann heldur uppá Hoyvík, má retta seg eftir okkum í hesum.

J. M. Matras: Eg var við í útvalginum 1916 í Kollafirði og hugdi at, hvussu plássið har egnaði seg til landbrúksskúlan. Vit hildu allir, at tað hóskaði nógso væl. Fyri okkum úr Norðoyum var tað kannska væl so gott, eftirsum fjøllini her vóru so lág og hagin so væl vallaður, afturímóti har norði hjá okkum, meu so mátti man jú eisini taka hensýn til, at onnur plúss í Føroyum eru uppaftur nógv betri enn á Kjalnesi. Innmarkin er gott brúkulig til at gera burtúr og hagin egnar seg væl til at dyrka upp. Tá voru allir eingir um, at plássið egnaði seg væl. Eg ætlí mær at stemma fyri, at vit leggja skúlan har, men eg skal tó ikki taka mær tað nær, um hann kemur at verða eina aðra staðni.

Th. M. Strøm: Tað eru tvey punktir, eg ætlaði at útlata meg um. Fyrst plássið, har skúlin er ætlaður at verða bygdur. Eftir míni meining er Hoyvík at fyritrekkja í staðin fyri Kollafjørð; sum representantur fyri Suðuroynna havi eg serliga grund til tað, tí skal royndarbrúkið hava betýdning fyri Suðroynna, so má tað vera so centralt sum møguligt, so øll kunnu síggja tað og lættliga koma hartil. Her eri eg samsintur við teir donsku menninar í kommissiónini, sum eisini fyritrekkja Hoyvík. Andrass Sámalsson plagar annars at dáma væl og seta prís uppá, hvat danskir menn halda, men her sýnist hann ikki at leggja stórt í teirra meining. Viðvíkjandi nevndini kann eg slutta meg til Patursson í tí, at lagtingið skal velja 3 menn, og teir eiga helst at vera Føroyingar; eru teir útdanmaðir í útlondum, so er tað menn við tvinnanda royndum, og tað má vera ein stórur fyrimunur. Føroyar eru nú eina leið so av natúrins hond beskafnar, at eingin dugir so væl at síggja, hvatið hóskar í Føroyum sum Føroyingar sjálvir. Tað hevur til fullnar vist seg í fiskarínum; her hava útlensk selskapir roynt seg, men úrslitið hevur ikki svara rokning sum tá Føroyingar sjálvir dríva fiskarí. Samuelsen sigur, at Føroyingar væl kunnu duga at dyrka jørðina og fáast við seyð, sjálvtum teir ikki hava hert í Kirkjubø; tað er altso eitt bevís fyri, at teir duga. Til hansara spottandi orð um Jóannes Patursson — hevði hann ikki verið farin mundi hann væl kunna givið Samuelsen aftursvar — skal eg einans siga, at Patursson ivaleyst er líkasu duguligur bóndamaður sum Andrass Sámuelson er sýslumaður.

A. Samuelsen: Eg eri glaður yvir, at Strøm leggur somiklan dent uppá, hvat danskir menn siga, at hann velur Hoyvík tí teir gera tað. Mær dámar yvirhevur væl tey ráð, vit fáa frá Danmark, men tá eg haldi meg sjálvan duga betri á at skyna, so haldi eg fast uppá mítt egna skjøn. Og eg haldi nú einaferð Kjalnes vera tað betra plássið. Annars er hetta klókur politikkur av Strøm, soleiðis at býta seg sundur: Kirkjubøbóndin fær sítt, hin parturin sítt, so hevur eingin nakað at siga. Hetta er óivað klókt, sjálvtum eg ikki vildi gjørt so. — Eg havi ikki biðið Kirkjubøbóndan fara út, tað ger mær tað sama, um hann er inni ella úti. Strøm veit ikki, hvussu duguligur eg eri sum sýslumaður, hann hevur einki bevís fort fyri tí, men eg kann fora nógvar grundir fyrí, at Kirkjubøbóndin sum landmaður er heilt óduguligur.

Th. M. Strøm: Andrass Sámalsson hevur einki bevís fort, bara leysar pástandir.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur mánadag 1. september.

Stuðningur til skúlaskeiðs.

3. viðgerð.

Formaðurin las uppskotið, sum gekk út uppá at geva 250 kr. til næsta árs skúlaskeið fyri lærarar og lærarinnur.

M. A. Winther (orðforari) mælti til at samtykja uppskotið.

S. P. úr Kunoy: Eg barsum vanligt eisini í ár hetta bonarbræv á ting. Tá sakin var til 2. viðgerð, fekk eg ikki sagt nakað víðari, tí at nevndarlimirnir vóru burtur. Eg vil tí nú siga mína meining um, hvat tingið hevur ætlað at veita til skúlaskeiðið, sum í fleiri ár hevur kunna samlað frá 20—30 lærarar at vera her í Havn frá 8—14 dagar. Eg haldi, at hesin peningur, 250 kr., er serliga lítil. Tað undrar meg, at fíggjarnevndin, sum væl veit, hvussu dýrt tað er at liva nú afturmóti fyrr, ikki

kann síggja nakran útveg fyri at fáa hetta talið eitt sindur størri. Tí tað er kunnugt, at tingið hevur heitt á føroyskar lærarar, tá okkurt nýtt skal byrjast í Føroyum. Andin í ednuligheitslógini kundi ikki førast út millum manna, um ikki lærarnir hjálpitu til. Hor var um dagirnar ein sak fyri um svimjing. Altur tað sama: fólkaskúlalærarnir máttu taka sær av hesum. Og so í øðrum eisini. Men nú vit hava biðið um hóskandi pening fyri at lærarnir kunnu koma saman til skúlaskeiðs, nu verður ikki virt so nógv um okkum. Í Havn kann mann ikki búgva fyri minni enn 3 kr. um dagin, og at býta 250 kr. út millum 30 menn, tað verður lítið til hvønn. Tað er næstan tað sama sum at siga nei fyri at geva studna. Men hettar er beteinkiligt fyri hvat føroyskir lærarar kunnu vænta sær. So skjótt talan er um hægri skúlar, um realskúlan, so gevur amtsrepartitiónsfondin betýðilig bolop til studning av næmingum til hendan skúlan. Og hesin skúlin er tó ikki sum hinir skúlarnir tí almindiliga fólki so mikið til gagn. Hann er mest til gagn fyri børn av teimum, sum hava pengar millum hendur. Men vit kunnu ikki fáa meiri enn 250 kr. Vit takka fyri tað, men halda, at tað er ósedvanliga lítið.

M. A. Winther: Hettar er tó sami studningur sum givin er frammanundan, og tað er ikki í bønarbrævinum biðið um, at hann skal hækkast. Og tá vit ikki hava nógvan pening at ráða yvir, so hildu vit tó, at hetta kundi vera ein hjálp.

S. P. úr Konoy: Tað er rætt, at vit ikki hava nevnt eitt bestemt tal. Men eg helt at var tað nakar, sum visti hvussu peningaviði er lækkað, so skuldi tað vera figgjarnevndin. Mær vitandi hevur samfundið upp ígjøgnum fingið betri økonomisk kor, sjálvt konga tinnurnar, sýshumenninir, hava fingið lønhækkan. Eg leggi vekt á, at lærarnir fáa gott útlatnilsi og kunnu koma saman til skúlaskeiðs, og tað eiga teir at fáa hampuligan studning til.

N. Debess: Eg havi mangan hoyrt framflutt, hvussu langt teir føroysku lærarnir standa aftanfyri lærarar aðrastaðnis. Hvat og hvussu mikið satt er í hesum dugi eg ikki at skýna á. Tað er vael so, at nú á dogum er tað ikki bert lærarar, sum noydast at nøra um teirra kunnleika, men fólk í øllum lívsins stillingum. Men lærarnir treingja ikki minst til tað, við tað, at tað eru so mong, sum eru avhongig av teirra dugilighcit. Og tá skúlaskeiðið er ætlað til at geva lærarunum meiri kunnleika, so eigur eisini løgtingið at gera teirra líkindi góð til at sokja skúlaskeiðið. Tá hendan sak var til 1. viðgerð, tá vónaði Konoy, at tingið í ár vildi lata nakað meir enn árið framman undan. Hetta er lítið, sum her skal latast. Tað verður ikki meir enn 75 oyru um dagin til hvønn, tá teir eru 25. Skulu teir so halda bestemtar menn til fyridragshaldarar, so verða ikki nógvir pengar eftir. Um vit enn eiga lítlar pengar so er hetta eitt so viktugt mál, at tað ikki er forsvarligt at halda hendan studna so lágt. Um vit góvu hægri studna, so kann tað tó ikki blíva til so miklan pening, at vit ikki eru førir fyri honum. Tá eingin er komin við broytingaruppskoti, verður tað sum tað nú er. Men eg vildi tó siga, hvussu mín støða var.

A. Samuelsen: Eg havi verið við í nevndini og eisini lisið bønarbrævið. Konoy segði væl tað, tá sakin var til 1. viðgerð, at hann væntaði, at vit góvu meir enn síðsta ár; men hann kom ikki við tí soleiðis, at tað bleiv eitt betýðiligt lið í diskussiónini til at hæðka um tað, sum var givið fyrr. Her er síðani sakin var seinast frammi, ikki frumkomið nakað nevniverdigt um, at man ynskir størri studning. Til hvat ið lærarin úr Gøtu segði, skal eg annars siga, at eg haldi, at vit við forskelligar loyligheitir hava víst elskverdigheit yvirfyri ikki bert lærarunum við realskúlan, men eisini við fólkaskúlan. Lærarin úr Gøtu tosaði um studning til menningar frá bygdunum í realskúlanum, eg meini, at man við góðum ratti kann siga, at tann studningur eisini verður givin fyri at hjálpa uppá okkara fólkaskúla. Táið vit fritóku lærararnar í fólkaskúlanum frá at betala til teirra egna privata pensiónskassa, var tað eisini fyri at stydja fólkaskúlan. Táið vit í mong ár hava givið studning til ferðakursus, so er tað eisini fyri at stydja fólkaskúlan. Nú nevndi lærarin úr Gøtu, at hetta útlatnilsi var nakað, sum lærararnir máttu taka; ja, sjálvandi má tað gerast um lærararnir skulu verða so góðir, sum tað er ynskjandi at fáa teir, men tað hevsyn, vit eiga at taka til okkara fólkaskúlalærarar, má rættast umtalast, táið vit fara at tosa um teirra lønforhold. Táið so lærarin úr Gøtu nevndi eitt ókvæmisorð, sum átti at pátalast, líka so vael sum lað átti at pátalast, um eg hevði kallað hann ein hálvstudentuðan o. s. v., so hevir hann við tí formerkað allan sýshumannsstandin. Hann

nevndi, at vit hevdu hakkað lonina hjá sýslumonnunum; vit hava jú eisini forhojað lonina hjá bøndunum; teir hava fingið so nógv meira forhojilsi í forhold til teirra grundlon enn sýslumennirnir. Táið so Nyholm Debess kemur fram og anbefallar, at vit skuldu geva meiri pening í studning til ferinkursus enn vant, so gevur tað mær eingi hop um, at tað verður samtykt; tí táið hann fer at seta sovorðið fram, dettur tað altið niður fyri. Hann framsetti nú um dagirnar uppskot um at geva styrk til eina kúgv, men táið tað so kom til at stemmast um hetta, var hann ikki so mikið sum til steðar at stemma fyri sínum egna uppskoti. So eg vænti, at táið sjálvstýrismenn hava fingið N. Debess til at taka sær uppá at biðja um meira tilskot, so fer hetta ikki at koma igjøgnum.

N. Debess: Eg skal hertil bert siga, at eg plagi ikki at fáast til nakað.

Konoy: Gud bevari meg frá at vilja fornerma allar sýslumenn í Føroyum, tað hevir ongantíð verið mær í huga.

Andrass likist her á tingi nakað Ádam í Paradísi; hann leggur skyldina fyri, hvat her er frankomið, yvir á meg, tó at eg bert havi framhildið, at tað var ynskjandi at fáa meiri styrk. Eg skal ikki siga meira og ikki koma inn uppá Andrass Sámalsonar tos. Eg sigi takk fyri hesar 300 kr., um vit fáa tær, eg havi ikki kraft meira, tó at tað kundi verið ynskjandi at fáa meira.

A. Samuelsen: So ero vit jú allir einigir, táið lærarnir siga takk og vit stemma fyri okkara uppskoti, kemur alt í ordan. Hvussu verður so við Nyholm Debess' uppskoti? Kanska hann vil sjálvur stemma fyri tí. Táið Konoy sigir, at hann vil ikki fornerma sýslumennirnar, ja, so er tað sjálvsagt, at hann *kann* ikki fornerma teir.

Samtykt varð at geva studning uppá 250 kr. til skúlaskeið í 1920.

Studningur til Føroya fólkaháskúla.

3. viðgerð.

M. J. Winther: Hetta er 3. viðgerð av hesari sak. Eg skal bert mæla til, at vit samtykkja nevndaruppskotið.

Nevndaruppskotið um at geva sin studning uppá 600 kr. fyri 1920—21 varð samtykt.

Rannsókn av soyðasjúka.

3. viðgerð.

M. J. Winther: Hetta er 3. viðgerð av hesari sak. Eg skal mæla til, at vit samtykkja nevndaruppskotið.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Studningur til kommunalar akvegir.

3. viðgerð.

M. J. Winther: Undir krígnum samtykti tingið at geva studning til kommunalar vegir, soleiðis, at man til almenna vegir í kommunum lovaði ¾ av tí, slíkir vegir vóru ætlaðir at kosta. Tingið helt hetta átti at vera gjort fyri at bota um dýrtíðina við at skaffa arbeiði, og sokti statin um at fáa hjálp til ein part av útreislunum. Tað var ætlað, at tingið skuldi lata 100,000 kr., statarin 50,000 kr., kommunurnar 50,000 kr., soleiðis, at í alt kunnu nýtast 200,000 kr. til hesi arbeiði. Tað skuldi vera til vegir gjognum uppdyrkningslendi ella torvvegir og aðrar kommunalar vegir. Har komu ógvuliga skjótt nógv andragandi, og tað var ikki leingi, áðrenn vorunevndin, ið hevði tingið hetta starv uppí hendi, hevði veitt studning til ein pening av gott 300,000 kr. Meðan hesir vegir vóru í gerð, eru allir prísir hækkaðir, arbeiðislonin eisini, og tað var tí samtykt, at hækka studningin við 30 %, og biðja statin eisini hækka sín part við 30 %, og var tað játtað av statinum. Nú vita vit ikki, hvorjir av hesum vegum verða gjordir, sumir koma ikki til útførilsi. Vit hava lingið nýggjar umsóknir frá Streymnesi, Skálavík, Dal og Skúvoy, men nevndin heldur, at vit kunna ikki svara uppá hesar umsóknir, fyrr enn vit hava sæð, hvussu verður við hinum vegunum, og vilja tí bíða til 1920, tá tíðin er umlopin, ið var sett til at gera vegirnar liðnar í. So er komið umsóknir frá Sandi og Vestmanna, um at fáa studningin hækkaðan. Eisini her meintar nevndin, at vit mega svara, at fyrr enn vit hava sæð, hvussu kostnaðurin verður við teir vegir ið eru í gerð, kann ikki svarast hernppá.

Eg kundi haft ógvuliga stóran hug til at hækka studningin til vegin heiman av Sandi til Søltuvíkar, tí tað er ein so umráðandi vegur fyri Sandsbygd og Sandsmenn hava gjørt eitt so ómetuliga stórt arbeiði fyri teirra vegir. Men vit mugu jú hava system í hesum og lata teir bíða saman við hinum. Táið vit altso svara aftur, at vit ikki kunna geva nakran bevilling í ár, er tað ikki tí vit vilja nokta studning, men eru noyddir til at útseta at geva hann. Vit eru sintir at hækka yvirslagssummin við 1,000 kr., sum er tað, ið á restar fyri vegnum millum Sands og Søltuvík. Í sínum brævi til amtið sigur ingeniør Jacobsen at tað hevir verið ógviliga vanskuligt at berokna hetta stykki. Nú siggi eg av einum skrivilsi frá amtinum, sum fyriliggur her, at amtið sigur seg einki brøv at hava móttikið frá ingeniørinum. Hetta má vera eitt misforstáilsi, tí eg havi avskriftir bæði av brøvinum frá ingeniørinum og svarskrivilsinum frá amtinum.

Tað er fryktandi fyri at fleiri amlegg ikki verða liðug til 1921, og eg forútseti tí, at viðkomandi forstandarskapir isofall vilja sukja um til næstu Ólavsøku at fáa frøystin úfsettan. Tíðirnir hava jú verið somógv betri enn vit av fyrstan tíð hovdu vontað, og tað er tí einki at undrast yvir, at fólk ikki hava meint seg hava ráð til at arbeiða uppá vegir fyri meira lonandi arbeiði. Skulu yvirslagssummirnir haldast, so kunnu ikki tær lanir gevast, sum nú eru kravdar, og tí kunnu heldur ikki hesi amlegg vontast at verða gjørd, har ikki ser-interessur studla til. Fólk má síggja sær inntoku og lotta í sínum livikorum av vegunum. Eg eri glaður yvir, at hetta sýnspunkt er galdandi heima á Sandi, men tað er kanska ikki allastaðni so. Eg vil hapa, at tingið vil vísa seg ímotikomandi móti sovorðnum plássum og hervið umbefala útvalgsins forslag.

J. Gattesen: Umframt tað, at Vestmenningar biðja um at fáa tilskotið hækka ynskja teir eisini at fáa tíðina útsetta eitt ár. Eg vildi gjarna vita, hvat útvalgið sigur um tað. Skal vegurin verða liðugur 1920, so verða teir noyddir at arbeiða uppá hann hvønn dag og harav verður hann so nógv dýrari. Eg hugsi Vestmenningar vera ógviliga beteinkiligir, um tað verður kravt av teimum, at vegurin skal vera ferdugur í 1920, so eitt eg teir heldur vilja botala tað sjálvir, sum gjort er.

M. A. Winther: Eg veit ikki, hvussu logtingið stillar seg til tey einkultu undragandini, men logtingshashubningurin er soleiðis, at anleggini skulu vera fullford innan 1920. Ein tíðsgrensa mátti setast; tað verður so útvalgsins sak, tá andragandini koma inn at bestemma, hvør tey ymsu anleggini skulu verða gjørd.

O. Effersøe: Det vil falde vanskeligt at udsætte Fristen paa nærværende Tidspunkt. Jeg er sindet til, for saavidt rimelige Grunde anføres, da at udsætte den Frist, som Lagtinget har fastsat, til det passende.

J. Gattesen: Tað kann sigast, at vegurin átti at verið fyrr begyntur, men sum oddfrøarin veit, kundi hann ikki begyntast fyrr, eftirsum ingeniørurin ikki kundi fáast til at nivellera vegin.

Th. M. Strøm: Vit í Froðbiar sóku havi eisini yvirvigað at frøystina forlongda. Har suðri eru tveir vegir, annar er begyntur, annar ikki, av tí at hann var so seint projekteraður. Eisini hava ymsar vanskuligheitir verið við at erverva grundarealir, og tað er ikki í ordan enn. Verður tíðin ikki forlongd, so stíri og fyri, at eisini hesir vegirnir fara at doyggja burt.

M. A. Winther: Tað kann kanska vera nógso kediligt, at hetta er so stórt framdrigið í diskussiónini, tí tað kann vontast, at fleiri vilja benytta sær av tí. Men er tað jú forhasta at taka nakað bestemmilsi í so máta. Vit fara at bíða til Ólavsøku og tá siggja, hvussu sær út.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Grundlógarbroyting.

1. viðgerð.

J. Patursson: Tað kundi verið hóvi til at fyrsti maður, ið talar um hesa sok, greinkti nakað gjalla frá okkara politisku viðurskiftum og tessvegna helt eina longri rødu. Tað geri og ikki. Eg skal tó geva eitt yvirlit yvir okkara politisku sogu. Hettar, sum er komið frá studentunum, er nakað nýtt, og tó er tað reiðiliga gamalt. Tað ur jú altíð hjá hesum mønnum at leggja framma fyri Føroya logting at hugsa um, hvat nú er at gera viðvíkjandi okkara stjórnarstoðu, nú grundlógarbroyting er fyri

hond í Danmark, og nú fólkaættindini aðrastaðnis í verðini koma meiri til sín rætt. Tá vit Føroya tingmenn skulu døma um hetta sum hor er komið framm, so kunnu vit ikki gera tað uttan at minnast á hvussu okkara stoða hevur verið frá tí okkara forfedrar noman hesar klottar. Teir komu higar yvir Skotland og Ísland og leinanvegin úr Noregi. Teir funnu hesar oyggjarnar so at siga óbygdar: bert nakrir fáar hildið til her av og á; annars funnu teir ikki oyggjarnar bygdar av øðrum enn írskum seyði og so avtikuar av fugli. Teir ognaðu sær landið og settu tingrætt; teir vóru jú vanir at liva leinna á Noreg undir ordnaði tingskipan, og tann sið fordu teir higar. Í teirri fyrstu tíð ráddu teir sær sjálvum heilt út; teir hovdu egnar lógir; og teir hovdu engan kong. Í tí næsta tíðarbili, sum kom, fór tað soleiðis fram, at teir ráddu í sameining við kongin í Noregi; teir gjørdu lógir heinna, sum teir bóðu kong um at samtykja. Vit hava nøkur dømir um hetta úr gomlum lógum. So sigst: «kongur játtar slíkar lógir sum teir hava umbiðið». Hettar er um 1200 talið. So sigst eisini: «Vilosa lóg hevur kongur játtað sum menn samtykta á altingie». Her er ivaloyst blandað saman orðini alting og løgting, eins sum tað mangan enn verður gjørt í Danmark. Teir gjørdu eisini sameining við kong, t. d. við Magnus Hákonarson í 1273 um, at tær lógir, teir gjørdu her, skulu vera galdandi lógir. Teir settu millum annað fyri at eingin føroyskur sýslumaður skal hava meiri enn tvoir kallsmenn. Og kongur játtaði eisini tað sum teir hovdu ásett: at tvey skip skuldu sigla árliga Føroya og Noregs millum. Hetta má vel vísa á at tingið var lóggevandi. Løgting betýðir jú lógting og ikki ráðgevandi ting. Hetta lagið helt seg meiri ella minni óbroytt niður gjøgnum tíðirnar. Í 1414 gjørdu teir eina skipan á løgtinginum, sum byrjar soleiðis: «So varð skipað av løgtingie. Her var tikið avgerðir uttan at kongur ella aðrir vóru eftirspurdir . 1 1416 valdu teir enn sínar egnu løgmenn, meðan alikir tá í Noreg vóru valdir sum kongaligir umboðsmenn. Í 1808 heldur hin danski maðurin Begtrup at løgtingið er forsvar fyri fólkið og hevur stóra ávirkan á alt alment sum gongur fyri seg. So kemur tann tíðin, sum fyri okkum ikki er so gleðilig. Í 1816 varð løgtingið avtikið og einki kom ístaðin. Men tá kundi maa halda, at Føroyingir ráddu fyri landinum saman við kongi og rentukammarinum. Men tá kom forordning úr 6. juni 1821, hvar tað verður ásett, at ovrigheitin í Føroyum skal siga antin danskar lógir skuldu galda her ella ikki. Tað vil siga, at eftir at tingið er avtikið, skuldu føroyskar myndigheitir spyrjast um, hvussu vera skal. So kom Stænderforsamlingen í 1835, og tað bleiv standandi við sama lagið. Føroyingar velja engan mann til Stænderforsamlingen at vera teirra talsmaður har. Men kongur setur mann fyri Føroyar so væl sum fyri Ísland. Nú kemur ein annar tíðarstreymur fyri londini, eisini fyri Danmark og fólkið fær meiri ræði enn fyrr. Og tann streymurin rekkur eisini higar heim, og tað kemur vuksi hiðani um at fáa tað gamla løgtingið, sum avtikið var í 1816, aftur á føtur. Teir vilja við N. Winther á odda reisa tað gamla tingið aftur og senda bonarbræv um tað til stænderforsamlingina. Men ti verri varð hesum bonarbræv ikki givið gastur. Og her haldi eg at tann fyrsti mismunur byrjaði sum Danir gjørdu millum Føroyingar og Íslendingar. Íslendingar fingu sitt alting aftur og teir hava væl yvirhovur staðið í sama spori yvirfyri donskum og norskum kongum til 1843. Tá kemur munur millum teir og okkum — mismunur millum eina bon frá Føroyingum og eina bon frá Íslendingum. Í 1847 biðja Danir Føroyingar at velja mann til Stænderforsamlingen. Øvrigheitin kallar sýslumonnini og sex bøndur saman til at samráðast um hetta. Teir koma ásamt um ikki at velja nakran. Teir hava einki ímóti at kongur hevur ein mann har, men teir vilja engan senda sjálvur. Av hesum kunnu vit gita okkum til, hvat Føroyingar vildu, um teir vóru oftinspurdir um, hvat teir hildu. So er tað at grundlógin kemur fyri í ríksdagnum 48—49. Tá hava vit engan mann valdan úr Føroyum. Menn millum teir kongavaldu er ein Føroyingur, ein okkara besti antmaður, Ployen. Og so vóru tá kongavaldir Íslendingar. — aftaná at teir hava fingið sitt egna alting. Ployen hevur gott skil á, hvussu Føroyingar vuskja at teirra stjórnarvidurskiftir skuldu skipast, tí hann setur framm, at grundlógin ikki skal gjalda fyrr enn Føroyingar verða atspurdir. Og tann danska grundlógarnevndin letur tað eisini koma, at Føroyar vóru eitt land, sum ikki var Danmark, men einans eitt danskt hjálond, sum Ísland. Eitt dømi um hetta er ein paragraff í verjuplíktslógini sum varð settur upp í 1848 á ríksdeginum. Har sæst týðiliga, hvat danskir tingmenn allir sum ein meintu um okkara stoðu í ríkinum inntil tá tíð: «Da de almindelige Regler om Værnepligt ikke findes anvendelige her, bliva

do der boende Personer at behandle som Udlændinge«. Altso her verður onn gjørdur munur á hvat sum er Danmark og hvat ikki. Vit skuldu ikki verða bundnir við verjuplikt utan vit taka fasta støðu í kongaríkinum Danmark. Vit eru altso ikki í Danmark. Pløyen bevdi eisini uppskot frammi á hinum grundlóggevandi ríkisdegi, um at grundlógin ikki mátti gerast galdandi í Føroyum fyrr enn Føroyingar vóru spurdir. Hansara uppskot ljóðar soleiðis: »Det forbeholdes Befolkningen paa Færøerne at maatte ytre sig angaaende den Maade, paa hvilken den vil have at deltage i den danske Folkerepræsentation«. Hann gekk tíverri frá hesum uppskoti, og við teirri endiligu viðgerð varð greinin samtykt soljóðandi: »Do nærmere Bestemmelser for Slesvig, Island og Færøerne forbeholdes«. Nú er tað at siga, at Íslendingar høvdu fingið lyfti um, at eingi skuldi vera gjørt, ið kundi broytt teirra statsrættsligu støðu, áðrenn teir sjálvir vóru atspurdir. Føroyingar høvdu haft sonn bon, men høvdu eingi lyfti fingið. Nú átti ein at tráð, at Danir høvdu haft sama sýn uppá okkum sum uppá Ísland, og høvdu lovvt okkum at ýttala okkum um grundlógina og vallógina. Men har um vóru teir ikki samsintir. Tað kom um hetta at standa stórt stríð á ríkisdegnum, ein stórur partur har vildi tvinga Føroyar inn undir grundlógina, ein annar minni partur framhelt Føroya serstøðu í ríkinum og Føroyinga rætt til sjálvir at vera við í hesari avgerð. Eg skal ikki lesa nógv upp av tí, ið tá var sagt í ríkisdegnum, men eg vil minna ollum tingmonnum til at lesa í ríkisdagstíðindi, hvat varð framhildið um hetta mál, táið sakin kom framm til avgerðar, og ikki bert lesa, hvat teir hildu framm, ið vóru samsintir við okkum, men eisini hvat mótstøðumennirnir sogdu. Eg skal lovva mær at lesa upp, hvat hin viðgitni lógfrøðingurin Ørsted, ið var formaður fyri nevndini, sogði undir viðgerðini av vallógini fyri Føroyar; hann var formaður í nevndini, men kom í minnital, táið atkvøtt varð. Hann sogði: »Mednndertegnede Ørsted holder for, at denne Sag ikke er moden til Afgørelse, forend der er givet Færøernes Indvaanere Lejlighed til at ytre deres Tanker om dette for deres fremtidige retslige Stilling og for deres Velfærd saa vigtige Anliggende. Ligesom denne Gruppe af Øer saavel i sin Naturbeskaffenhed som i hele sin Udvikling er højst forskellig fra det egentlige Danmark, saaledes have de aldrig været henregnede til dette Rige, at de for dette gældende Love uden videre særskilt Bestemmelse der have været gældende. Efter Reskriptet af 12. Maj 1688 og Frdng. af 30. Maj 1691, § 14 skulde Kristian den 5tes norske Lov der være gældende, men uden at dette dog ligefrem udstraktes til du derefter for Norge udkomne Love, ligesom Færøerne heller ikke i det fremtidige Lovsprog blive indbefattede under Norge, men tværtimod jævnlig blev benævnte som en baade fra Norge og Danmark forskjellig Landsdel, hvorpaa Forordning af 3. Juni § 16 og Forordning af 11. August 1797 § 23 kunne tjene til Eksempler, og allerede det nævnte Reskript af 1688 viser, at den da nylig udkomne norske Lov ikke umiddelbart som en saadan, men kun i Kraft af en særlig kongelig Befaling blev gældende for Færøerne. Efter at Norge ved Fredstraktat med Sverrig af 14. Januar 1814 blev afstaaet til denne sidste Stat, men med Tilføjelse om, at Færøerne ej deri vare indberegnede (hvilket paa lige Maade blev bestemt med Hensyn til Grønland og Island), er der heller ingen almindelig Bestemmelse givet, hvorefter disse Øer skulle være indtraadt i Lovfællesskab med Danmark. Norske Love og de norske Forordninger, som der vare indførte, ere blevne i Kraft, og uagtet de senere Anordninger, som ere givne for Færøerne, have sluttet sig til de danske og i nogle Enkeltheder frembragt nogen større Retslighed, end der forhen fandt Sted, saa har dog altid været en fast antaget Regel, at ingen for Danmark udkommet Lov som saadan havde bindende Kraft paa Færøerne, men først efter at det var undersøgt, om den enten uforandret eller med visse Lempninger der kunde være anvendelig, hvorpaa det, naar det først fandtes klart, var ved kgl. Resolution af 6. Juni 1821 overladt vedkommende Regeringskollegium, men i andet Tilfælde var Kongen selv bestemt at ordne det fornødne. Fra den Tid af, at Provinsialstænderindretningen var traadt i Virksomhed, blev Spørgsmaalet, om de for Danmark udgivne Anordninger skulde gøres gældende for Færøerne, først forhandlede i Stænderforsamlingen for Øerne, der tilligemed var Stænderforsamling for Island og Færøerne. Der er intet i Grundloven, som kunde føre til det Resultat, at de for Danmark udkomne Love umiddelbart og uforandret skulde være gældende for Færøerne. - Saa sigir hann seinni: »Men jeg kan ikke antage, at Grundloven ligefrem er anvendelig paa Færøerne, da disse ikke er nævnte i samme, og der intet Hensyn til Færøerne er taget under Forhandl-

lingerne om Grundloven, ligesom det er vist, at de i Lovsprogut ikke indbefattes under Danmarks. - Til allarsidnast, hvar hann nælir til, hvussu eigir at vera atborið við at fáa skil á Føroya statsrættsligu stoðu: »Hvilken Fremgangsmaade, der rettest vil være at benytte for at sætte Færingerne i Stand til at udtale deres Mening om denne Sag, maa vel overlades til Regeringen. Kun antager jeg, at der vil blive bedst Lejlighed dertil paa „St. Olai Dag, da en stor Del af Landets Indvaanere plejer at samle sig i Thorshavn, hvorfor de kunde foranlediges til talrigere end ellers at indfinde sig, naar dette Anliggende kom under Behandling. Naturligvis kunde der af en saadan vilkaarlig sammentrandt Forsamling ikke tages nogen afgørende Beslutning, men med Hensyn til de der udtalte Meninger kunde vel Amtmanden bemyndiges til at nedsætte en Komité til at afgive Betænkning over Sagen, og enhver vilde have Lejlighed til imedens at indgive til Komitéen de Oplysninger og Meningsytringer, som han maatte finde tjenlige til Sagens Ordning. Naar Sagen saaledes var forberedt, kunde der med større Sikkerhed tages en Beslutning om dens yderligere Behandling«. — Eg hugsi tað, at allir tingmenn vilja siga, at hetta var púra beint; hatta var tann stund táið okkara politiska støða, sum hon hevði verið inntil tá, skuldi broytast, og tað var ein beinur máti, Ørsted fyrislóg. Tað kom tó ikki til at ganga soleiðis. - - Sjálvt uftaná at grundlógin var givin, náttu Danir, sum Ørsted eisini ávisti, ivast í, um danskar lógir utanviðari vóru galdandi í Føroyum, men so kom eitt ministerielt skrivilsi av 5. Juli 1855, hvar justitsministarin avger hetta soleiðis: »at det maa formenes, at de af Rigsdagen vedtagne og af Kongen stadfæstede Love ogsaa ere gældende for Færoerne, naar der ikke i Lovene selv findes nogen udtrykkelig Bestemmelse om det modsatte.« Táið tað var gjort, gav ministeriið ordra til at tinglesa alla tær lógir í Føroyum, ið vóru givnar síðani grundlógina. Hetta var altso eingin lóg, men ein justitsministeriel avgerð; hetta hevir verið praxis síðani, og undir tí praxis hava vit livað og liva enn. Nú standa vit her og spyrja: hvat er at gera? Eg nevndi áðni, at tað id studentafelagið ber fram, er bæði nýtt og gamalt. Frá landnámstíðini til grundlógin varð tinglisin ráddu Føroyingar fyri teimum lógum, ið vóru givnar fyri teirra land; eingin donsk lóg varð gjord galdandi uttan at Føroyingar vóru spurdir, men síðani 1855 hava allar danskar lógir verið galdandi í Føroyum, utan táið annað hevir verið skilað til. Her standa vit sjálvstýrismenn yvir fyri sambandsmonnum. Vit krevja meira ræði í okkara landi, sambandsmenn siga, at teir halda uppá tað gamla, ja, so hevir tað vel verið tann almenna uppfatan at tað eru sjálvstýrismenn, ið vilja hava sina nýggja stoðu, meðan sambandsmenn standa á teirri stoðu, ið vit altíð hava haft, men tað er jú tvertfrímóti: vit sjálvstýrismenn krevja aftur okkara gomlu stoðu, tá vit høvdu meiri ræði í okkara landi, men hina gomlu stoðu umskipaða eftir tí, sum nútíðin krevur, meðan tann stoðan, ið sambandsmenn siga altíð hevir verið okkara, ikki gongur longur aftur enn til 1855. Tað var jú tað, Niels Winther helt fram í hinum danska ríkisdegi, tað fyrsta hann var valdur har inn, at tað var ikki eitt sovorðið løgting, ið Føroyingar ynsktu, sum tað vit fingu tá, og tað er tað, vit hava enn, men eitt ting, hvar Føroyingar fingu virkuliga avgerð av teirra egnu málum. Eg kann ikki ætlað, at tann hugsan, ið sambandsmenn hava borið fram, skal kunna halda leingi við í Føroyum; allir frammiligir Føroyingar, likafrá Niels Winther til sýslumann Effersøe, áðrenn hann varð sambandsmaður, hava hildið uppá okkara gomlu stoðu; her meini eg tá gomlu stoðuna, meðan hon var góð. Eg haldi tað ikki vera beint at koma av nógv inn uppá, hvør ið hevir skyld fyri, at vit ikki eru komnir longur, men eg skal minna á, at vit í 1906 vildu hava eina forhandling við Danmørk um hetta, vit vildu í 1907 samráðast við danskar ríkisdagsmenn, ið tá vóru í Føroyum, tað var báðar ferðir forðað fyri tí av sambandsmonnunum. Tað er sjálvandi og skiligt fyri hvønn mann, at táið vit fara undir hetta mál, so er tað ikki nakað nýtt; tað byrjaði kanska beinleiðis í Føroyingafelag, ið hvussu er, haðani er vaxin upp tankin í Føroyum um at royna tað mesta, ið moguligt var at koma til at ráða okkum sjálvum. Tann tankin hevur síðani ligið aftanfyri hjá mongum logtingsmonnum, hur ímillum Schrøtari sýslumanni. Í 1903 setti eg fram eitt uppskot um, hvussu okkara viðurskifti skuldu ordnast: í 1905 fingu vit eitt program, tað var Framburðsfelagsins program. Tað er forstáiligt, at vit hesi fyrstu árini stóðu heldur skinklandi og ikki reiðuliga vóru klárir yvir, hvat vit vildu ella rættari, hvussu langt vit vildu ganga; vit vóru jú politiskir menningar og eru tað fyri alt tað enn. Tað er heldur ikki lætt, so mong ár framman-

undan, í odd og egg at kunna peika út, hvat vit í kommandi tíðum koma at krevja, men harfyri er tað óbeint at siga, at vit ikki hava ávist nakað bestemt. Tað hava vit gjort — eitt annað er, at vit ikki eru slopnir framat við nokrum; vit hava jú ikki rátt. Táið eg nú verði spurdur, hvat tað er, vit yvirskja, skal verða gjort, so sigi eg: Tað, sum Føroyafólk yvirskir, tá tað fær sansað sær og ikki verður forstýrað, og her er eitt yvirskí, sum Føroyingar allir eru sameintir um í teirra innasta: at løgtingið fær maktina her á landi. Teir hava eitt orð í Danmark, sum sigur: Ingen over og ingen ved Siden af Folketinget! Tað sama haldi og, Føroyingar í teirra hjarta meina, tá talan er um løgtingið. Ja, eg eri so djarvur at siga, at sambandsmenn ikki einans her í tinginum, men úti um landið siga tað sama, tá teir lugsa sum Føroyingar, at teir eisini halda tað vera beint, at løgtingið skal ráða í Føroyum. Eg eri aldeilis ivaleysur í tí. Men tá so er, skuldi tað sýnst ikki at verið ónøguligt, at vit í eini slíkari sak kundu einst og í hvussu er ikki komu upp at berjast við persónligheitum; um vit enn eru av ymiskum meiningum áttu vit tó at kunna fört tær sakligu framm. Er grundarkenslan hendu, sum eg havi sagt, so átti alt løgtingið at kunna gingið saman, og gjørdu vit tað, so vildi alt Føroyafólk sagt: Tit gjørdut beint! Úttra hesum grundarlagi vóni eg, at vit kunnu fáa nakað gott burtúr hesum, tá vit bera okkum at sum tað sonnir seg fólksins valdu monnum. Tað er okkara plikt at fara væl um hendu neistu, her er kveiktur; um eitt og annað kann vera at finnast at í bræv teirra studentana, so mugu vit ikki gloyma, at teir hava fingið fatur í tí, sum tó býr innast inni hjá hvørjum góðum Føroyingi. Tað, vit hava at kanna eftir sum praktiserandi politikarar er: Hvat báðir okkum mest! Vit sita her og arbeiða á tingi og siggja, hvussu lítið kemur av skafti, alt stoggar. Hesum má fáast bót fyri. Hetta mugu vit granska og leita eftir, hvar atvoldin er at finna, og tá vit so hava funnið hann, verður næsti spurningurin: Hvat eru vit Føroyingar førir fyri til tess at ráða bót uppá hetta ringa lag? Er tað nú so, at hin danska grundlógin, so sum hon er, ger tað, at vit ikki kunnu koma somikið fram sum Føroyingar krevja, ja so er einki meira sjálvsagt, enn at vit biðja Danir lata okkum fáa so frælt frá røsar, at vit kunnu orðna okkara viðurskifti uttan at grundlógin hvørja ferð nýtist at verða brøytt fyri tað. Er hon eitt haft, sum bindur Føroyingar so hvørt sum teir menna seg og vilja fram, so mugu vit fáa útvegir fyri at loysa hetta haftið. Eg vil biðja um, at løgtingið, nú tað fer undir hendu spurning, sær sakliga og við bliðum eygum uppá hann, og ikki gloymir, at hetta er ein royndarstund fyri okkum Føroyingar eins og fyri allar mentaðar tjóðir runt um heimin, ein royndarstund skapt av tíðarstreymimum, sum nú eisini hevur vitjað okkum. Tað var at yvirskja um Føroya landsvaldu menn skiltu hetta til fullnar. Eg vil mæla til, at sakin verður beind til eina 5-manna nevnd.

O. Effersøe: Jeg skal ikke med det samme komme ind paa en Omtale af Hr. Patursson's »historiske« Foredrag, men holde mig til det saakaldte Studentterbrev. Det er forstaaeligt, at den færøske Studentterforenings Forslag om Grundlovsændringen vinder Selvstyrepartiets Bifald, thi Forslagets Gennemførelse vil svække den statsretslige Forbindelse mellem Landsdelene, mellem Færøerne og det øvrige Rige, og tilrettelægge Forholdene for en Ophævelse af denne Forbindelse til et senere Tidspunkt. Det er i denne Sammenhæng værd at mindes, hvad vi hørte forleden Dag, nemlig at en af Selvstyrepartiets Førere fremsatte Krav her i Tinget om

1) Lovgivningsmyndighed for Lagtinget, og
2) en særlig paa Øerne bosat færøsk Minister, ansvarlig overfor Lagtinget, samt
3) antydede end mere yderliggaaende Krav.

Man maa være paa det rene med, at Adskillelsen mellem Landsdelene vil være fuldbyrdet, saa snart Kravene er sket Fyldest. Faar den foreliggende Sag Fremme, vil desuden Færøernes forfatningsmæssige Stilling i Riget straks være ændret. Sambandspartiet maa som Følge heraf bestemt modsætte sig Forslaget om, at der indsættes en Bestemmelse i Grundloven, gaaende ud paa, at der kan tillægges Lagtinget Lovgivningsmyndighed ved almindelig Lov.

Det er mig ikke nærmere bekendt, hvilke Personer den færøske Studenterforening omfatter, men jeg kan vel gaa ud fra, at Foreningen hovedsagelig bestaar af unge Mænd, Færinger, der studerer i København. Jeg forstaar meget vel, at disse unge Mænd med de Følgenskaber, som nu engang hører Ungdommen til, føler sig tiltrukket af Ideer, der fremhæves under Navn af Selvstyre, Selvstændighed,

Frihed, Folkenes Selvbestemmelsesret og deslige. Imidlertid bør vi Landets kaarne Mænd, der skal tage vare paa, at intet sker Folket til Skade, vi, der har Ansvaret overfor Vælgerne, ikke lade os blænde af glimrende Ord, men søge ind til Sagens Kerne, til Livets Virkelighed. Hvorledes ser da Virkeligheden ud? Lovgivningsmyndighed for Lagtinget vil være ensbetydende med, at Lagtinget overtager Raadigheden over alle Færnes Anliggender og samtidig hermed ogsaa det fulde Ansvar ogsaa for at fremskaffe de fornødne Pengemidler. Med Ret følger Pligt, med den fulde Raadighed alle Forpligtelser. Kravet om Retfærdigheder maa imidlertid vejes mod Evnen til at opfylde Forpligtelser, men intet forstandigt Menneske kan tvivle om, at Lagtinget vil savne Evne og Midler til paa egen Haand at fremme Borgernes Lykke og Velfærd. Allerede Fremskaffelsen af de fornødne Pengemidler vil være en Umulighed. Lad os tage Sagen, som den er, uden Fantasteri eller Digt. Hvor vil da de skønne Ord blive af? Men Befolkningen vil lade sig nøje med disse alene? Jeg tror det absolut ikke! Det, som overfladisk betragtet, synes ophøjet og stort, vil endog i bare Jammerlighed. Jeg kender ingen Udvej til at skaffe de fornødne Pengemidler, og jeg kræver den paavist. Jeg haaber ikke og kan ikke tro, at man agter at bygge den nye Ordning paa Bekostning af det Samfund, hvorfra man søger at fjerne Færøerne, eller paa en indbildt Fordring paa Statskassen, hvorom vi hørte forleden Dag. Begge Dele vil vise sig umulige og desuden, det værste af alt, ganske uværdige.

Skrivelsen fra Studentarforeningen begynder med en Omtale af Anskuelser, som visse betydelige danske Mænd, A. S. Ørsted, A. F. Tscherning, N. F. S. Grundtvig, har fremsat i 1849 paa den grundlovgivende Rigsdag. Med al Respekt for disse Mænds Betydning iøvrigt, vil jeg tillade mig at hævde, at de har taget grundig fejl, at de har ladet sig altfor stærkt paavirke af skønne Teorier uden tilstrækkeligt Kendskab til Virkeligheden. Jeg lader mig ikke paavirke eller skræmme af, at man fører disse Mænd frem. Jeg vil sætte min personlige Opfattelse, bygget paa Erfaring og Kendskab til de virkelige Forhold, imod deres. Historien vil sikkert, om Eksperimentet med Selvstændighed iværksættes, bekræfte, at jeg har Ret.

Dernæst maner Studenterne i smukke skønne og poetiske, men vanskeligt forstaaelige Ord frem for os, hvilken Lære vi bør drage af Verdenskrigen. Det er imidlertid meget svært at domme herom og endnu sværere at anvende Læren paa den hos os foreliggende Situation. I Henvendelsen fremhæves Ideen om Folkenes Selvbestemmelsesret og national Retfærdighed som Resultat af Krigen, men vi maa vogte os for ensidige Betragtninger. Vi maa ikke glemme, at Folkenes Forbund, som er opstaaet ved Fredsslutningen, grunder sig paa Tanken om Sammenslutning indenfor Menneskeheden mellem Riger og Folk. Det er Samlingstanken, Tanken om, at alle Mennesker er Brødre, som herved har vundet en stor Sejr, i Fald den føres videre ud i Livet, og det er denne, og ikke de splittende Kræfter, haaber jeg, som ejer Fremtiden, og det er denne, som maner os til Sammenhold indenfor det danske Rige.

D'Hrr. Studenter indprenter os, at nu er vor Besøgelsestid inde, nu gælder det om at tage en rigtig Beslutning. Efter denne højtstemte Indledning kunde man med Rette vente, at der vilde komme vægtige Ord, et godt og betydningsfuldt Forslag, eller, selv om Forslaget ikke blev godt, saa dog noget stort og betagende. Jeg haabede, da jeg havde læst den første Part af Henvendelsen, at det følgende i ethvert Fald vilde indeholde et Opraab til Lagtinget og til Færingerne overhovedet om at føre en ædel og ærlig Politik. De blomstrende Ord udmunder imidlertid kun i et Forslag om, at der ved en Grundlovsændring skal lirkes ved den forfatningsmæssige Forbindelse mellem Færøerne og det øvrige Rige saaledes, at denne til et senere belejligt Tidspunkt kan blive let at løse. Ikke engang et aabent og frejdigt Forslag, om at hugge Knuden over, om at ophæve Samhørigheden og lade Færøerne sejle sin egen Sø med Selvstyret ved Roret. Desuden burde d'Hrr. forstaa, at Gennemførelsen af deres Forslag er en Umulighed. Visse vigtige Grundregler bør være fælles for Riget, og disse bør ikke kunne ændres af den Folkerepræsentation, som til en given Tid er ved Magten, eller i et Øjebliks Stemning. Derfor har man samlet disse Regler i Grundloven, som det er langt vanskeligere at ændre end andre Love. Blandt Reglerne i Grundloven er Bestemmelsen om Lovgivningsmyndighed en af de mest betydningsfulde, og d'Hrr. maa ikke tro, at Regering og Rigsdag vil samtykke i, at der ved almindelig Lov skal kunne overdrages Lagtinget Lovgivningsmyndighed. Jeg mener heller ikke, at der indenfor den færøske Befolkning

findes nogen stærk Stemning for det foreliggende Forslag eller overhovedet for en Ændring i Øernes forfatningsmæssige Stilling i Riget, naar blot Spørgsmaalet herom kommer til at staa isoleret og klart for Vælgerne.

Deri er jeg fuldt enig med Studenterforeningen, at det nu er vor Besøgelsestid. I en nær Fremtid maa det afgøres, om vi skal gaa til Grunde i en gold Forfatningsstrid i Stedet for at staa Skulder til Skulder i den Kamp for Tilværelsen, for Befolkningens lykkelige Udvikling, som Tiden vil kræve af os. Den store krigerske Styrkeprøve mellem Riger er endt. Den har for os medført Ængstelse og Fortræd i forskellige Retninger, men vi har høft den Lykke ikke direkte at blive indblandet i Striden, og er tilmed kommet over Krigsaarene økonomisk styrkede. Det færøske Folk maa dog ingenlunde tro, at det nu kan lægge sig paa den lade Side og leve af Krigsfortjenesten. Nej, nu gælder det rigtig at anstrenge sig. I den kommende Tid vil der blive en økonomisk Kappestrid, som vil kræve den højeste Anspændelse af ethvert Menneskes og af ethvert Samfunds Kræfter. Af os vil Tiden kræve Udvikling af alle Virksomheder, at alle Erhvervsmuligheder, strængt Arbejde og god Økonomi. For at alle gode Kræfter kan virke sammen paa vore Øer, baade i det private og i det offentlige Liv, er det uomgængelig nødvendigt, at den bitre Strid, som skiller det færøske Folk i to modstaaende Lejre, ophører. Følger vi Studenterforeningen, vil der imidlertid blive mere Strid, mere Agitation end hidtil paa det forfatningsmæssige Område, thi den paatænkte Ændring er som skabt til at agitere paa. Idet jeg paa det mest indtrængende maner til Ophør af den forfatningsmæssige og nationale Strid, vil jeg hævde, at denne Strid er rejst uden tilstrækkelige Grunde. Færøernes forfatningsmæssige Stilling i det danske Rige er ikke til Hinder for vor frie Udvikling. Den giver os det Selvstyre, den Selvbestemmelsesret, som vi efter de naturlige Forhold behøver og kan bruge. Grundloven er ikke for os et snærende Baand, eller en Lænke, den giver os Ret til Samhørighed med det danske Folk og kan kun være en Støtte for vor Udvikling. Heller ikke paa det nationale Område er der Grund til Strid. Sambandspartiet er og har altid været villigt til at fremme det færøske Sprog og den særlige færøske nationale Udvikling i det hele taget. Hvis den forfatningsmæssige og nationale Strid hørte op, kunde der forhandles uden Had og den Bitterhed, som tager mere og mere Overhaand. Jeg er klar over, at der dog ikke vilde indtræde almindelig Landefred, og saadant vilde heller ikke være af det gode, men Udvekslingen af modstaaende Anskuelser vilde faa en anden Karakter, og vore offentlige Forhandlinger vilde medføre større Gavn for Samfundet. Jeg tænker, at der f. Eks. vilde herske afvigende Meninger om, hvorvidt Lagtinget burde paatage sig flere eller færre Opgaver, om Tempoet i Udviklingen overhovedet, og om der burde stilles større eller mindre Krav om Skatteydelse fra Befolkningen, men det vilde blive noget andet end det nuværende, det tror og haaber jeg.

Jeg maa forøvrigt gøre opmærksom paa, at det er noget mærkeligt stødende, rent utiltalende, at vi, samtidig med at kræve Ophævelse af vor forfatningsmæssige Stilling i Riget, uden videre gaar ud fra et økonomisk Fællesskab og i Henhold hertil stiller store Krav til Riget (til Statskassen). Den Politik kan ikke holde i Længden, thi den har ikke nogen naturlig Forudsætning.

Det er Selvstyrepartiet, som har rejst den politiske og nationale Strid. Det er dette Parti, som bør lade Striden falde. Vi har fra vor Side vist os imødekommende. Vi kræver kun: Intet Brud paa Forfatningen eller paa den gamle folkelige Samhørighed med Danmark.

Hvis vore unge Mænd, der studerer i København, kunde bidrage til at formindske den politiske og nationale Modsætning indenfor det færøske Samfund, vilde vi være dem Tak skyldig. Ligeledes hvis de kunde bidrage til at dygtiggøre Folket ved ihærdigt Arbejde paa deres Område, ved at tilføre Øerne Kundskaber og Arbejdskraft, kort sagt, ved at yde et vægtigt Bidrag til at bygge Landet op i dets Besøgelsestid.

Deres Forslag om Grundlovsændringer kan Sambandspartiet ikke give sin Tilslutning. Vi vil modtage det som fremsat i en god Mening, men det duer ikke, og maa derfor vises tilbage. Med Glæde ser vi derimod den Grundlovsændring gennemført, som er en virkelig Følge af Fredsslutningen, af vore sønderjydske Brødres Forening med Riget. Vi vil ikke bidrage til at kaste Malurt i Bægeret i Glædens Stund.

Endelig vil jeg sige til Studenterforeningens Medlemmer, at de kan være forvissede om, at Lagtingets Sambandsparti vil værge og værne om Øernes Herligheder og

Rettighedar, som det hedder i deres Skrivelse Det vil vi, men vi vil ikke stotta uberettigede, unødvendige og fordærvelige Krav.

S. P. úr Kanoy: Eg vil fyrst siga, at uppá meg hevur bravið frá studentatunum virkað sum ein gleði. Tað var fyri meg, sum um mann har boð til min frá tí Danmark, sum einaferð hevur forstaðið Føroyar og norðanlondini. Eg kann ikki vera samsintur við Effersoe í, at gauli Grundtvig og Tscherning og Örsted hava tikið grundliga feil. Eg haldi, at teir hava sæð beint. Og tað hevði verið gott fyri Danmark, um tað hevði fylgt Grundtvig væl. Hann helt fyrilestur hin 14. mars 1848 í »Slesvig Hjælpeforening«. Danir stríddust júst um tað sama sum nú, um markið har suðuri. Grundtvig segði tá, at »kendsgerninger er nogle slomme krabater«. Hvar er danska fólkið og hvar er tað danska markið? Eg gangi ikki við at seta tað longri suðuri enn har, sum fólk talar danskt og hava hjarta fyri douskum mális. Men hava ikki vit drigist við teir »slemmu krabatar«. Vil ikki sambandið erkenna, at her livir eitt fólk, sum ikki er danskt, eitt fólk, sum hevur sit eyðkenni í landsins natúr, í fólkalyndi, í tungumáli og mongum øðrum viðurskiftum. Tað er eyðvitað, at hetta fólk má hava ein rætt fyri seg. Og tað, at eitt slíkt fólk arbeiðir fyri sínum nationala útviklingi, tað er sjálvsagt. Eg skilji tí ikki ropið frá sambandsíðu um at halda uppat. Hvat skulu vit halda uppat við? Skulu vit tala danskt? Hvi skulu vit siga við tunguni, at vit lugsa og føla okkum sum Danir? Men ikki eru tað kortini. Tað er best, at bæði Danir og vit fúa skiligt at vita, at her eru tvey fólk, sum eru bundin saman. Og tað minna fólkið, um tað er lítið, eigur at njóta sama politiska frælsi sum hitt stóra. Vit mugu kunna eiga tað, sum er okkara fyri okkum sjálvum. Eg kann aldri lugsa mær, at vit Føroyingar í framtíðini skulu vilja halda tað vera nógumikið, at vit senda 2 menn niður til Danmarkar sum okkara umboðsmenn í hinum danska ríkisdegi, tí teir hava altíð verið fremmandir har og hava kent seg sum fremmandar, og síðani eg kom ims í politikk eri eg meira og meira styrktur í tí, at hatta er ikki vegurin, um vit ynskja politiskt framstig her á landi. Tað er sjálvandi altíð ein vanskulig situatión fyri eitt fólk. Táið idealini skulu vigast upp ímóti gullinum, sum Effersoo og Andrass Samalsson hava gjort her í dag og yvirhovur alla tíð; men óivað hava eisini ommur fólk staðið yvirfyri slíkum. okkara forfedrar hava staðið yvirfyri tí, men tann tíðin var øðrvísi og let teir ikki siggja so klárt sum nú og eisini fingu teir einki loyvi til at ráða fyri sær sjálvum. Men eitt vil standa fast. fult politisk frælsi fáa vit ikki, utan okkara representatión verður broytt eins og oll okkara statsrættliga støða. Um tað so skuldi komið til tess, at Danir siga, já, táið tit vilja hava tykkara stoðu í ríkinum broytta, so mugu tit eisini vera utan okkara hjálp, ja, so svari eg fyri meg, lat okkum vera utan teirra hjálp. — Eg vil siga her í dag, og havi hug til at takka hesum unga monnunum; einki er natúrligari, nú grundlógin skal takast upp til broytan, at tað so verður givið okkum henda lyftigroin, ið ikki vil gera annað, enn halda Føroya fólki leiðirnar opnar til at taka ta stoðu í framtíðini, ið nú tykjast tí tann besta. Hetta mátti kunna verið gjort uttan nakra misstenning. um Danir unna okkum væl. Eg kann aldri trúgva, at vit hervið skulu upparbeiða nakað serligt hat ímillum hesi fólk; vit eru einaferð langt av leið skotnir og okkara vinnuvegir, okkara nationalitet og søga, alt er øðrvísi enn Danmarkar. Eingin kann yvirbevísa meg nu, at tann eini maðurin, vit senda niður í fólkatingið, kann har fáa tann rætt ímóti hinum 130, sum okkara serliga nationalitet og søga gevur okkum krav uppá. Tað vísir seg eisini í Føroyum, at henda uppfatan vexur, tí tilsluttningin til løgtingsvalini er nú heldur størri enn til ríkisdagsvalini. Hesir menn, ið hava sett hesa umsókn inn á ting, hava valt sína heldugu stund, og eg haldi tað ikki vera ivasamt, hvat svar vit siga at geva teimum.

J. Samuelsen: Eg kann sjálvandi í allan slutta meg til, hvat ordførarin fyri okkara parti hevir sagt; tá eg havi biðið um orðið, so er tað fyri at koma inn uppá ymist, ið hevir verið frammi viðvíkjandi hesi sak, og sum ordførarin ikki nerti við. Eg skal luta, sum henda umsókn er komin úr Keypmannahavn, tó at tað hevir staðið í einum blaði her í býnum, at sjálvt um umsóknin ikki var komin hadani, so hevði óivað sjálvstýrisparti her í Føroyum sett hana fram. Táið studentafelagið í Keypmannahavn reisti hendu spurning. var landsstingsmaðurin og eg til stevnar. og vit droftaðu so saman við studentunum hendu spurning og teir spurningar, ið vilja koma fram í samhurði við hesum. So vítt eg veit, hava studentarnir droftað,

hvat ið vildi ske, um hetta verður gjøgnumført. Og teir hildu, at um so var, máttu vit kunna klára okkum sjálvir bæði málsliga og økonomisk, um ikki Danmark vil hjálpa okkum. Teir framhildu tað keðiliga í, at vit einki yvirlit hava yvir, hvat vit fáa frá felagskassanum og hvat vit lata til hansara. Tað var serliga ein teirra, ið hevði fingið hetta at kanna eftir, og hann framhelt, at hann kundi ikki trúgva, at vit fingu meira frá statskassanum, enn vit kunnu klára sjálvir. Táið eg nú vil nevna nøkur tøl til belýsning av hesum forholdi, vil eg ikki nevna annað, enn hvat ið vit nødvendigvis koma til at betala, her verður einki ið kann trekkjast frá, heldur má nakað leggjast aftrat. Eg skal fyrst taka, hvat ið viðvíkir administratiónini. Hon hevir kostað 100,000 kr. seinasta ár. Ísland hevir altíð kostað hetta sjálvt, tað mega vit eisini, um vit fáa sjálvstýri. Heilt nøjaktigt er tað gingið til lønir til embætismenn, kantórhald og dýrtíðarhjálp 99,000 kr., altso næstan 100,000 kr. So er útbetalt í erstatning fyri tíggjund 18,800 kr. Nú er so, at tíggjundin og nakað, ið var avloyst saman við henni, var størri enn hetta beløp, og tað, ið er inukomið við spiritustollin, ið skuldi dekka hetta, er ikki meira enn fjórðingurin. So er lønin til prestarnar 14,000 kr. Til ikki specificeraðar útreislur 11,000 kr., til forsikringsfereining fyri motorbátar 1,000 kr. Alt hetta mega vit yvirtaka, um vit fáa sjálvstýri. So er tað skúlarnir. Teir hava frá statskassanum fingið eitt tilskot uppá 116,000 kr., tað er sjálvandi eisini ein útreisla, vit mega taka, sjálvt um vit ikki gera heilt upp við statin. Til háskólan betalir statsins 24—2500 kr., tað mega vit eisini taka. Í aldurdómsundirstøttilsi er útbetalt einar 5—6000 kr., tað er jú smábeløp, kann mann siga, sum tað ikki loysir seg at taka við, men hetta tilskotið vil vaxa í sama forhold, sum vit sjálvir geva meira til hetta formál. So er tilskot til plantagjuna 1500 kr., tilskot til avhaldfelagið 500 kr., tilskot til sanatoriið 25,000 kr. Tað seinasta hoyra vit at fáa gjørt væl størri. Amtsparkitiónsfondin fær eitt tilskot uppá 3000 kr., lat okkum eisini taka tær við. Tilskot til koyrivegir hevir verið 19,500 kr. og vit hava fingið lyfti um meira, upp í 51,000 kr. og upp í ein fjórðing av tí, vegirnir koma at kosta meira enn ætlað av fyrstan lið; haruppi í er ikki kostnaðurin til teir stóru vegirnar millum bygdir; til slíkar vegir er útbetalt 40,000 kr., vit venta meira um. Til sjúkukassarnar hevir statsins latið 18,200 kr. Í refusión viðvíkjandi smittandi sjúku uppi á landi 2,300 kr. Eg leggi burtur úr pengarnar til børn av einkjum og ymsk annað, tí her er ikki gott at kalkulera, hvat almindiligt er. Til dýrtíðarhjálp, tilskot til kommunurnar í Føroyum er útbetalt henímóti 400,000 kr. So eru forskelligar pensiónir, bæði geitsligar og verðsligar, 5,400 kr. Fýrvesinið hevur kostað 17,500, men tað er minni enn so alt; eg hugsi hetta er til løningar og tað, sum fýrvesinið kostar her í Føroyum. Sjálvsagt átti allar útreiðslur at verið tiknar við. So er ein postur, sum vit ikki meina átti at verið førdur uppá okkara konto; inspektiónsskipið; tað er 116,000 kr. Vit kunnu gera sum vit vilja, sentin vit rokna tað við ella ni, men vit behøva ikki at gera tað fyri at koma uppá eitt ógviliga stórt beløb. Til óhukkuforsikring havi eg ikki kunna seð, hvatíð útbetalt er, men tað sigur seg sjálvt, at vit her hava ein stóran vinning framum um Íslendingar í tí, at okkara liskarar kunnu forsikrast í tí donsku forsikringini. Statslilskotið er ógviliga nógv túsund; tað var yvir 100,000 nøkur ár herfyri. Verða øll hesi tølini samanlogd, er tað nærum ein millión, vit árliga fáa frá statinum. Tað er tó eitt alvorligt beløb. Eg ivist ikki í, at táið studentarnir fáa at vita, at vit eitt einkult ár fáa 1 millión frá Danmark, so vilja teir krossa seg. Latum okkum so hyggja at teimum inntøkum, staturin hevur fingið av felagsskapinum við Føroyar hesi ár: Leiga av kongs- og matrikulskatti 17,245 kr., innfoktir av vraki 5080 kr., — tað er ógviliga ójavnt, ífjor var tað serliga nógv — avgift av kongsfestum o. a. 17,000 kr., betalt í botum 1,400 kr.; tað er mest av injurinsokum, men um tað vil vara við, vaxa ella kannska heilt falla burt — men vilja kanska heldur sita tur av — tað er ikki gott at vita. Í gebyr fyri kgl. bevilingar er betalt 1,735 kr. 70 øyr, tað er eisini ógviliga variabilt, viðhvørt er hetta einki. Innforsilsavgiftin, sum skuldi verið 30,000 kr., er bara 5000 kr. Teir gomlu sportlarnir ið fyrr hava verið o. a. 9000 kr. falla ójavnt, — alt í alt: meðan útgiftirnar hjá statinum til Føroyar eru upp ímóti einari millión, so eru inntøkurnar 45,000 kr. Tað er ein lítil postur aftanímóti tí stóra posti, her er talan um. Eg havi framdrigið hesi tøl, tí tað hevur stóra interessu bæði fyri fingmennirnar og tað føroyska fólkið at kenna hvør eins og fyri teir, sum skrivað hava hetta andragandi; teir sogdu fyri mær, at teir vóru keddir av ikki at hava nøkur tøl at halda

seg til. Vit allir fára nú at yvirvega, um Føroyingar eru mentir at senda danska statinum uppsøgn og harvið taka tær pliktir, ið fylgja við. Tí tað er ein absolutt forútsetningur hjá studentunum, at vit skulu yvirtaka okkara pongaviðurskiftir sjálvir. Tað hava teir sagt so ofta, at um vit forlanga, at tað land, vit vilja skiljast frá, skal betala alt, so eru vit álmussudýr, og tað sigur seg sjálvt, at tað fólk, sum uppalt verður uppá tann máta: bara at krevja rætt til at ráða sær sjálvum, men ongar pliktir hava, tað kann hvørki hava merg í beinunum ella bein í ryggimum: tað verður eitt fólk av ólukkudýrum, ið blakast hegar og hagar, sum ikki kann trívast á Føroya steinum. Tað tralalyndi kann væl ikki teinkjast at vera í Føroya løgtingi, at vit skulu krevja sjálvstýri uppá tað, at Danmark skal betala tað. Tað vilja Føroyingar ihvussu er ikki ganga við til; teir hava ongatíð haft tralalyndi í sær. Tá vit fara undir hetta spursmál, mugu vit grundiga yvirveya, hvat tað kostar at vera raskur kallur. Men so kunnu sumir siga: Ja, men vit fara ikki bara at lyggja at peningaspurningimum; er sjálvstýri idealið, so má tað ikki avhalda okkum frá at taka við tí, at tað kostar pengar. Eg vil hertil siga, at vit eru born av Danmark, vit eru ein stór familja; eitt lítið amt í tí stóra felagsskapi; um tað ikki er so innbringandi sum hini, so lata vit tó eftir forimunni. Um sjálvstýrismenn vilja benokta tað, so lat teir bagrunda, hvat vit kunnu lata meira. Soleiðis sum viðurskiftini eru, lata vit eftir okkara forimunni. Tað er mikið møguligt, at ber er onkur maður, sum kundi betalt meira í statsskatt, men so er tað eisini natúrligt, at teir niðri lata okkum behalda slíkar menn til amtskommunalt útnyttilsi. Vit mugu væl minnast til, at umframt okkara millumverandi við statin hava vit jú okkara egna skattavesin, og tað er nógso hogt uppi. So vilja teir eisini siga, at statsroknskapið gevur eingi yvirlit yvir okkara millumverandi við Danmark: her spæla handilsviðurskiftini eina nógv storri rollu av tí, at menn niðri í Danmark tjena so nógvar pengar uppá Føroyar. Tað hevur staturin eingi við at gera. Vit brixla ikki Bretlands monnum ella Norðmonnum, at teir tjena pengar uppá Føroyar og krevja ikki tí rættindi av tí bretska ella norska statinum. Vinningin, teir njóta av okkum, samsýna teir við vinningin, vit njóta av hesum handilsfelagsskapi. Annars standa vit jú aldeilis frítt her; okkara keypmenn eru ikki pliktugir til at handla við Danskarar. Eg vil tí alt fyri eitt taka lívið av hesum påstandinum: um nit tað, vit lata til Danmarkar gjøgnum handilsfelagsskapið; tað kundi passa uppá kongliga handilin, men ikki nú. Annars skal eg ikki koma inn uppá okkara viðurskifti í aðrar mátar ug navnliga ikki inn uppá tann historiska útviklingin, tingmaðurin í Kirkjuba kom við. — Man kundi spyrja, um Føroyingar yvirhøvur ynskja at fáa tann statsrætsligu støðu, sum Ísland hevur nú og bera tær byrðar, sum Ísland nú ber. Eg ynski tað ikki. Sjálvt um Ísland skuldi kunna klára seg við tí støðu, teir hava fingið, so var tað ómøguligt fyri Føroyingar at kunna gera tað sama. Um hetlar krav, sum her er frammi, var komið frá Danmark, so máttu vit tikið við tí, men og vildi betrakta tað sum einaringa gerð, um tað kom haðani. Men kravdist tað haðani, so vildu vit ikki biðja um náði; men tað krevst ikki. Kravið er reist hiðani. Patursson meinti, at tað var vanskiligt at finna tað tíðarpunktið, tá Føroyingar byrjaðu at spekulera uppá sjálvstýri; hann meinti tó, tað var í »Føroyingafelags« at teir komu á tað. Tí felagsins program var, at Føroyingar í øllum lutum kundu vera sjálvbjargnir. Eg var eisini í Føroyingafelag og í bestýrilsinum og var við at drøfta, hvat meiningin var við hesum programmpunkti. Men vit hevdu jú mannin millum okkum — R. Effersøe —, sum setti hetta programmið; so at vit vistu, hvat tað betýddi. Og eg vil sláa fast, at tað ikki skuldi forstandast soleiðis, sum Patursson nú forstendur tað. So sigir tingmaðurin úr Kirkjuba, at sjálvstýri so ofta hevur verið frammi í Føroyum: í 1903, 1906, 1907 og 1909. Men hann gloymdi at siga 1915, tá er tað framumsett greiðliga her á tingi. Men sambandsmenn hava altíð avvíst tað, tí tann spurningur, sum her er talan um, er vitleysur, og men kann ikki vænta, at fjoldin av Føroyafólki skal ganga við til hetta. Fólk vil halda at vilja vit hava rættigheitirnar, so noydast vit eisini at taka tær tungu forpliktilsir, sum fylgja við. Patursson ivaðist ikki í, at tá fólk fekk sansa sær, so vildu tey vera samsint í tí, sum studentarnir seta fram. Eg haldi, at Føroyingar eru klárir yvir, hvat teir vilja sign til tað. Fólk ynskja ikki at ganga hendan vegin. Táið valg hevur verið, so hava sjálvstýrismenn hallað væl um teirra sanna endamál og hava tess vegna fingið stemmur í sín part. Men sjálvt sjálvstýrisveljarar vendla frá, tá teir síggja, hvat tað rætta endamálið er. Sambandsmenn hava altíð sansað sær,

og tá sjálvstýrismenn fáa sansa sær, so vilja teir vonda sær ímóti sjálvstýrinum og taka eitt sjálvstýris tingmann av og annan eftir, um ikki teir blíva við at emballera, hvat tað er, teir vilja. So heldur Paturesson, at tað ynski liggur í hvørjum føroyskum mannabarmi, at eingin skal vera yvir og eingin við síðuna av løgtinginum. Tað eru nógvir Føroyingar, sum gjøgnum tíðirnar hava undir tí gomlu grundlógini sluttað seg heilt til tað danska orðið: Eingin yvir og eingin við síðuna av fólkatinginum. Og vit fingu eina nýggja grundlóg av 1915. Eisini hana kappaðust Føroyingar um at sluttа seg til. Tað er vanskiligt at finna Føroyingar, sum vilja at hesi orð skulu galda fyri løgtingið. Men tað eru nógvir Føroyingar, sum vilja at tingið skal hava indflydilsi. Mer og hugsi, at tað kann teinkjast at koma eitt tíðspunkt í okkara søgu, at tingið verður soluiðis skipað, at einki verður avgjørt eftir einum ári, nen at man fær sakirnar aftur úr Keypmannahavn fyri at yvirvaja tær betur. Tað sum síðsta ár er farið frá løgtinginum, vísir tað. Skáttalóg- og løgtingslóguppskotið fingu vit aftur, tí vit ikki ifjør dugdu at greiða tað nóg væl úr hondum. Tað vildi tí ikki vera heldugt, um løgtingið bleiv einaráðandi, soleiðis, at hvør illa hagreidd avgerð skuldi vera galdandi. Men Paturssøn gongur víðari og sigir, at sambandsmenn í sínum hjarta ynskja, at tingið skal hava hægsta myndigheit. Tað er illavorðið at siga um okkum, at tá vit arbeiða ímóti, at tingið skal hava lóggávuvald, so skal tað mótsatta vera tilfeldið. Er tað vakurt at siga, at tá vit arbeiða fyri einum, so meina vit eitt annað. Kannske Paturssøn roknar eftir sær sjálvum. Vit upptreda her eftir okkara yvirbevísingi, og vit ynskja av løgtinginum, at tað skal geva góð ráð til ministerium, regering og ríksdag, og at løgtingið skal stýra okkara amtskommunalu viðurskiftum, so tað kann blíva til gagn fyri okkara fólk. Vit ynskja, at eingin yvir og eingin við síðuna av okkum í okkara kommunalu málum. Ifjør var farið til Danmarkar at biðja um approbatión á kommunal mál. Tað áttu vit ikki at gera. Eg eri ikki í tvívl um, at hetta bravið frá studentafelagnum vil blíva viðtikið her í løgtinginum. Sjálvstýrismenn kunna ikki annað og tora heldur ikki annað, tí annars vildi tann agitatión, ið er ført fyri sjálvstýrinum, hingið í luftini. Tað eru jú eisini aðrir spurningar enn hesin, ið eru á lofti, og sum krevja grundlógarbroyting, og sum eg las íáðni í einum bløði, vildu sjálvstýrismenn her í Føroyum jú eisini hava borið hetta fram. Men við hesum er eitt stig gjørt fyri at upploysa felagsskapin millum Danmark og okkum. Sjálvstýrismenn hava grund til at vænta, at okkara serligi ministari, statsministarin, vil fylgja teimum og hjálpa teimum til at fáa nakað viðtikið, ið vil upploysa okkara samband við Danmark. Hann hevir hjálpt sjálvstýrismonnunum fyrr, sum vit vita, sjálvt um hann hevir kent teirra virkuligu stoðn, so tað er at ætla, at eisini í Danmark vilja vera menn, ið vilja arbeiða fyri einum skilnaði. Men vit sambandsmenn og teir, ið vilja sum vit, teir, ið vilja samla og ikki skilja, vit vilja arbeiða ímóti hesum her, og komi eg niður á ting, vil eg stríðast ímóti, alt tað eg eri mentur, og tað kann eg so mikið betur, sum eg á ollum fólkafundum, eg havi verið á í ár hetluppi, havi sagt, at tann ið vil styðja hesum uppskoti, hann skal ikki velja meg. Um hetta verður til virkuligheit, vil tað føra okkum í armóð, gera okkum til trælir og fáa okkum til at siggja okkum sum óluktudýr og missa tann sjálvtillid, vit kunnu hava nú sum fríir borgarar í einum frían landi. Táið og tosaði við studentarnar um hetta, fráraddi eg teimum at koma fram við tí, og eg segði, at eg vildi arbeiða ímóti hesum, og sambandspartíið vil kempa ímóti hesum, sjálvt við danskar menn, og tað vil hvør sambandsmaður gera, ið kemur niður, sjálvt um tað skal vera við statsministaran sjálvan, vilja vit kempa fyri teim rættigheitum, vit hava nú. Eg havi tikið henda stilling á ollum fólkafundum, og eg eri glaður yvir, at eg havi fort tað fram har, tí tað hevir fingið tilslutning ikki bert av sambandsmonnum, hvat er sjálvfylgiligt, men eisini, eftir hvat eg havi merkt, frá ógviligа nógvum sjálvstýrismonnum. Hetta er, sum studentarnir siga, ein ryndarstund; her vilja nakrir menn lokka okkum út uppá ævintýr; tey eru góð at lesa, men man skal ansa seg fyri at fara út uppá ævintýr. Nú ræður um at standa fast; vit ætla at standa á tí grund, okkara forfedrar hava staðið á; vit ynskja kortini ikki at fara so langt aftur sum til ár 900, ta samfundsskipan, ið tá var, ynskja vit ikki nú. Tingmaðurin úr Gotu citeraði Grundtvig, hvat hann segði um Slesvig. Mær dámar hetta úttalilsi væl, men tað kann í ongan hátt yvirførast til føroysk forhold. Um og tráði, at her vóru nógvir menn á landinum ið vildu sagt: vit eru av norskari rót, vit føla okkum sum Norðmenn, og vit vilja arbeiða fyri at blíva Norðmenn, so var meining í tí, sjálvt um

eg ikki vildi arbeitt fyri tí. Men soleiðis er ikki stillingurin í Føroyum. Tað kann vera, at tað er ein einstakur Føroyingur, ið kennir seg nærri skyldan við aðrar enn Danskarar, og kanska tað er ætlanin at uppala eitt fólk í Føroyum, sum skal hava hesa hugsan, fyri at kunna motivera ein skilnað. Vit eru ikki í øllum líkir Danskarum, men statsborgarliga sað fola vit okkum sum Danskarar. Eg trúgvi ikki, at tað er eitt víða útbreitt ynski í Føroyum at vonda aftur til Noregs, heldur ikki at knýfast til ta íslandsku natiónina; teir flestu Føroyingar ynskja at vera við Danmark. Konoy segði, at sambandsmenn høvdu aðra politiska interessu enn sjálvstýrismenn; ja, tað vísti seg, at í sama bili sum spurningurin um okkara stoðu til Danmark varð hildin fram, fóru menn á valg, sum aldri høvdu valt fyrr, tí teir sóu, at nú galt um at royna at verja tann stilling, vit hava haft í 100 ár. Konoy segði, at føroyskir ríksdagsmenn aldri hava følt seg sum danskir representantar; og veit ikki, hvussu teir hava følt seg, men eg má siga fyri meg, at í tí arbeiði, eg havi haft harniðri, havi eg følt meg sum binir, ikki sum Kjøbinhavnara, tað gera jútarnir heldur ikki, eg havi haft mínar interessur, teir hava haft teirra. Konoy segði, at ein maður minnar einki; táið Føroyingar bert velja ein mann í fólkatingið, so eru teir illa stillaðir; tað dugi eg ikki at siggja, tí hesin maður stendur tó saman við nógvum øðrum, ið allir arbeiða fyri Føroya besta, líka væl sum hann. Eisini er tað sagt, og eg hugsi tað er beint, at eingin ríkisdagsmaður hevur so nógv innflydilsi uppá sakirnar úr sínum kresi, sum tann føroyski. So segði Konoy: spurningurin er, um vit vilja verða eitt frítt fólk ella ikki. Nei, tað er ongaulunda so. Tingmaðurin í Gøtu yvirdrívur sum hann er vanur; hann er nakað agitatorisk anlagdur. Eg havi sagt tað fyrr: Vit *eru* eitt frítt fólk, vit hava allan okkara rætt saman við hinum danska fólkinum, har fríheitin er so fullkomin sum hjá fáum øðrum fólkum. Hvor maður í Føroyum hevur sín stóra politiska rætt — spursmálið er, um vit vilja behalda hesa rætt ella geva hann frá okkum fyri at leyna eftir einum rætti, sum vil gera okkum til politisk ónagadýr. Sjálvsagt fara vit at lata hesa sakini í eina nevnd, so fragar samdir mugu vit vísa studentunum, men eftirsum hetta jú ikki er nakað nýtt spursmál, má sakin kunna behandlast samsum við logtingslógini; eisini hon forútsetur jú endringar í grunnlógini. Tað er tí ómiligt at behandla tær saman. Eg forútseti, at hesa sakin eins og hin skal fara í kommissiónina, sum ministerið og sjálvstýrismenn skulu útnevna menn til. Sambandspartiið vil ikki vera við til at útnevna menn til eina kommissión, sum ministar Zahle niðursetur; eg líti ikki á, at har kann koma nakað gott burtúr. Vit vilja tí einki meira enn at lata sakina fara í útvalg. Lat so sjálvstýrismenn senda hana í kommissiónina sum í ein begravilsiskassa, hvar hon kann liggja til grundlógin er broytt. So eru teir sloppnir av við hetta pinliga spursmálið hesa ferð og so kunnu teir begynna aftur at agitera við at krevja sjálvstýti. Eg havi tað hestemta inntrykk, at sjálvstýrismenn eru alt annað enn glaðir við hetta bræv, men fyri skomm skyld noydast teir at láta sum teir eru glaðir við og vilja stydja tað. Innarst inni eru teir illa við — studentarnir eru komnir teimum so nógv av tíðliga. Nú ræður um at fáa beint spurningin í begravilsiskassan, so kann altíð takast fatt seinri. Men eg hopi, at sjálvstýrisveljararnir allir sum ein nú venda sær frá teimum og siga: Hetta vilja vit ikki vera við til. Nú teir forstanda, hvat tað er, hesir menninir vilja, geva teir teimum nakk fótin á eitt vist stað.

R. Rasmussen: Tingmaðurin í Fuglafirði, hevur uggað seg sjálvan við eini langari roðu; hann vil og ikki svara aftur. Tað sum eg havi at siga viðvíkjandi okkara *ríkisstoðu* havi eg sagt í tí máli, her var á tingi um dagarna viðvíkjandi lúnum aftanskastaðu lógum um logtingið og skattamálini, og nýtist mær ikki at endurnýggja tað her nú. Mær tykir ikki, at vit nú nógmikið lógræði á logtingi undir grundlógini so sum hon nú er. Vael er tað t. d. so, at ríkisdagur og kongur við lógum í nokrum einstokum málum geva logtingi í samráð við ríkisstjórnini ein rætt til at gera lógreglur galdandi í nevndum málum, t. d. grindaveiðu, skúlaskipan o. s. fr. Men við áviki á tær fraalsisreglur, sum nú eru frammi í tíðini, og við áviki á hvussu okkum gongst við at fáa løgtingsins samtyktir framdar, haldi eg hetta vera ovlítið. Og tá vit sjálvsagt ikki kunnu fáa meira eftir grundlógini sum hon nú er, mugu vit krevja broyting. Spurningurin verður so um, hvussu mikið lóggávuvald logtingið skal hava. Mær tykir, at soleiðis sum okkara fólk stendur í politiskari ordning (okkara politiska voksnið er bert 12 ár), er tað óheint at avgera eina ferð fyri allar, hvussu vítt lóggávuvald logtingsins skal verða. Eg vil halda fyri at vera

beinast at vit við grundlógarbroyting fáa opnar resur til at taka innundir løgtingsins lóggávuvald so mikið sum Føroyingar til oinahvørja tíð halda seg vera førar fyri at taka. Nú veit eg, at sambandsmenn og teir, sum við teimum halda, siga sum so: »Hetta er óhóskandi, tit kunnu tá ikki biðja danska statin styðja eitt forhold, sum vil fora til eina leysari og leysari støðu Danmarkar og Føroya ímillum. Tit mugu antin vera hjá ella frá«.

Tað, sum sætt verður, avbongur oftast av oygunum, sum síggja, og tá tað nú er ivaleyst, at sambandssjón er ólík sjálvstýrissjón, má teirra áskoðan á hesa sonn sok vera óeins. Sambandsmenn ganga útfrá, at vit í kraft av fíggjarfelagsskapi við Danmark eiga okkara lut í teim miðlum, sum ganga út úr statskassanum; men hann má vera lítil, tá vit vilja vera líkamenn. Vit lata lítlan statsskatt í samanburði við teir, vegna tess at vit liva undir øðrum skattaprincippum enn menn í Danmark, og nógv ovlítil til tað, sum okkum torvast til framburð. Sjálvstýrismenn ganga útfrá at vegna tess, at vit eru uttan okkara vilja og vitandi tiknir í felagsskap við Danmark hevur hetta land harvið fingið eina plikt til at skapa eins góð framburðslíkindir fyri borgarunum í Føroyalandi sum fyri borgarunum í Danmark - antin á tann hátt at okkum verður givið ekonomisk sjálvstýri og frían rætt til at nýta landsins skattaevnir, okkum sjálvum til frama, ella á tann hátt, at tað av felags statsmiðlum verður gjørt fyri okkum, og so má staturin um at halda seg skaðaleysan í okkara skattaevnum, um hann vil.

At hetta soinra ikki er gjørt, bera oll viðurskiftir í okkara vanroktaða landi vitni um. Vit mugu tí hava rætt til, ikki bert at krevja hitt fyrra, men eisini at bøta um tað sum forsømt er við hitt seinra. Tað er tí ikki nøkur minkan fyri okkum ella krenkandi fyri Danmark, at vit nú krevja fría støðu til at taka í okkara hond stýrið av viðurskiftum her á landi so hvørt sum vit gerast førir fyri tað; annað og meira krevja vit jú ikki, og vit krevja tað tí vit harvið meina best at kunna menna okkara land, so tað kann verða javnbjóðis onnur lond. Og tað má tá vera til vinning fyri heildina. Tingmaðurin úr Suðuroy helt í síni røðu fram, at eitt tílíkt sjálvstýri sum vit krevja verður ovdýrt. Dýrt og bíligt er altíð forholdsvist. Síðsti talari setur upp, at okkum vildi torvast um 1 million um árið til at stýra okkara landi við. Sum og minnist, so hevur danski staturin eina útgávu á roknskapinum síðsta ár okkurt um lag 400 miliónir. Lat okkum síggja hetta í samanburði við fólkatalið í hesum báðum londunum. Í Danmark verður hetta okkurt um 130 kr. uppá einstaklingin, meðan tann eina miliónin hjá okkum bert verður 50 kr. til hvønn. Hettar er ikki at taka fyri nakað heilt forhold uppá viðurskiftini. Tí í Danmark eru betri skattaevnir og fleiri útvegir til at taka skatt. Men munurin er so stórur millum í Danmark og her, at okkum verða ikki 50 kr. tyngri enn 130 teimum. Tað er tó nógv hjá okkum at fara at bera 50 kr. pr. hodd í skatti, men hvat bera so ikki onnur lond, sum onntá ikki hava verið í kríggnum? Tað gongur upp hjá teimum at halda landastýrið gangandi, men tað gongur og gongur væl, hví skulu vit so óttast. No heilt at fella í fátt av stórum tølum, skulu vit ikki; tey mugu síggjast saman við øðrum storri tølum.

J. Patursson: Eg hugaði eftir hvat fyrsti orðførarin hjá sambandsmonnum hevði at bera framm viðvíkjandi hesum máli. Eg fekk tann fatan, at hann ikki vil fremja tað, sum studentarnir seta fram, at okkum skal gevast atgongd í framtíðini at skipa okkara statsrættsligu viðurskiftir við almindiligari lóg. Eg eri forharmaður um tað; tí her er eitt uppskot til, at tað gerst lovviligt hjá Føroyingum at broyta teirra statsrættsligu skipan, tá tað lýskar. Tí er nógv fyri hjá okkum at siga nei og at tað skal hvørki vit ella okkara eftirkomarar hava atgongd til. Tað skal ikki kunna gerast uttan at eitt stórt verk, sum eitur grundlógarbroyting, verður sett í gongd. Hettar er at binda for stórkar kleppar á eftirtíðina. Iffersoa sigir, at ríkisdagurin vil ikki. Vil Iffersoe tað? Man tað ikki ráða nógv um á hvønn hátt eitt slíkt ynski verður sett fram. Vit eru eitt gamalt og tó eitt ungt fólk og sum eitt ungt fólk meinist, so krevur tað meiri tím til at arbeiða. Eg vil eimleiðis enn biðja samhandsmenn hugsa seg væl um áðrenn teir siga nei til hetta. Iffersoe sigir, at fáa vit lóggávuvald, so mugu vit eisini taka ansvar fyri okkara finantsiellu viðurskifti. Eitt árligt budgett á 1 million um árið er ikki so ómetaligt. Ísland hevur o. u. 3½ million. Vit mugu hava í huga, at vit hava klára okkum frá tí vit bygdu Føroyar og til 1870. Og hava til tá givið avlop. Vit hava latið skatt til norskan kong, ja til pávan í Róm og til Danmark inntil 1870. Skulu vit halda, at vit í framtíðini vera so nógv ringari enn teir gomlu. Mangar

staðnis í Danmark, hvar valamenn hugsa nakað um okkara, siga teir, at vit hava verið nógv forsomdir. Tað er bert 60 ár síðani vit sluppu úr monopolhandlinum. Vit vóru stongdir fyri at kunna selja klippfisk. Hvussu hevur hitt danska ríkið útgjørt okkum síðani? Vit kunnu lyggja yvir land okkara, hvussu vorðið er. Hvat er gjort fyri samferðsluna, fyri jarðabrúkið og í øðrum viðurskiftum her móti tí sum gjort er í Danmark. Okkara land er illa røktað. Men Danir eru so mikið smulcarir, at teir siga: vilja tit ráða tykkum sjálvir, so vilja vit ikki seta okkum ímóti, og vit vilja ikki, at tit skulu fara frá okkum sum eitt land, sum vit hava óroktað.

O. Effersøe: Patursson talte om Historie. Det man kender til Færøernes Historie, er noget fattigt, og man skal være forsigtig med at byggo paa det. Men vil man byggo paa Historien, skal man tage den som den er. Patursson siger, at vi fra Oldtiden og til Grundloven selv har givet vore Love. Det er ikke saa. Hvad angaar Landnamstiden og kort efter den, da har vi derom ingen andre Beretninger end i Færøya sogu. Der tydar det paa, at det, som galdt i den Tid, var den stærkeres Ret. Nu kommer det an paa, hvordan man ser paa den Tilstand. Det er vel Frihed, den ubundne Frihed. Men er det Meningen at faa den Tilstand indført igen? Patursson sagde, at det gamle Lagting havde været en lovgivende Institution. Men det var i alt væsentligt kun en Domstol og en ringe Domstol. Det skod Sagerne til København, naar det ikke selv kunde klare dem. Dette skal ikke være saa at forstaa, at Tinget ikke havde sin Betydning ogsaa som Domstol. Vi ser, at Tinget blev ophævet i 1816. Mon det ikke var fordi Tinget var blevet saa svagt, at det daarlig kunde staa? En velkendt færøsk Mand lignede jo Tingmendene med Rossleypar. Udtrykket var ikke heldigt, men det tyder paa, at der var Folk, som ikke havde samme Opfattelse som Patursson. Det Lagting, der ophævedes i 1816, var ikke nogen folkevalgt Institution, det var valgt af Embedsmænd, og man skal ikke fremstille dette Lagting med nogen særlig Glans; det har gjort sin Gavn, men til Nutiden vilde det ikke svare. Hvad Lovgivningen angaar, saa er det de norske Konger, der har afgjort den; det synes at have været noget lignende som nu; Lagtinget gav Forslag, og saa blev Sagerne undersøgt og Kongen gav Loven. I hvert Fald maa Hr. Patursson vide, at Enevoldsregeringen blev indført her paa Færøerne, og da gav Kongen alle Love, han har maaske reddet sig efter Ønsker her fra Færøerne, men han havde hele Magten. Naar det nuværende Lagting sammenligner med det gamle fremstilles som havende mindre Indflydelse, saa er det ikke rigtigt. Lagtinget har betydelig Indflydelse paa Lovgivningen, naar det bærer sig rigtigt ad, det har et betydeligt Selvstyre over sine egne Midler indenfor Grundlovens Rammer. Det er dette, vi Sambandsmænd holder paa og sætter Pris paa. Jeg forstaar ikke, hvorfor Hr. Patursson fremdrager alt dette fra den gamle Tid; hver Tid har sine Krav og meget er blevet forandret gennem Tiderne. Ogsaa det Land, hvorfra vore Forfædre er komne, er blevet forandret: der var en Tid, hvor der sad Fylkeskonger, men man maa ikke tro, at Nordmændene skulde være saadanne Tabere, at fordi det engang har været saadan, at de saa vil ønske den Tid tilbage. Tiden er gaaet frem; der har fundet en Sammenslutning Sted; og jeg tror, at den Sammenslutning, der i den seneste Tid er foregaaet mellem de nordiske Riger indbyrdes, vil yderligere fastnes og styrkes. Livet er det stærkeste og Livet vil til syvende og sidst komme til at virke. Det er muligt, at det kan blive gennemført, hvad Selvstyreopartiet vil, det er muligt, at Færøerne trænger til en Dukkert; det vil kun blive en kortvarig Tilstand, Livet og Livets Krav vil gøre sig gældende, saa kan Hr. Patursson og hans Følger mene, hvad de vil. Hr. Patursson fremstiller sig forhandlingsvenlig og sagde, at han havde altid været det, at han i 1906 havde Forslag fremme om at ænes, og at jeg da havde fraraadet dette. Jeg vil ogsaa i Dag fraraade, at følge Hr. Patursson og komme ind paa Glidebanen, de nationale og forfatningsmæssige Forhold, hvorunder vi lever, er for mig tilfredsstillende. Det var ganske interessant at høre Hr. Patursson Udlægning af Foroyingafelags Program; jeg havde tænkt paa at tale derom, men da Hr. Samuelsen har talt derom, skal jeg ikke sige andet end at hvad han sagde var rigtigt. Men nu ved vi, at Hr. Patursson var en af dem, der arbejdede for at lægge noget andet ind i Foreningens Program. Hr. Konoy sagde, at vi havde vor egen Historie og vor egen Udvikling; jeg mener, at Hr. Konoy sør for ensidigt paa Sagen. Jeg mener, at vi i et langt Tidsrum har haft Historie sammen med det øvrige Danmark, og at vi i et langt Tidsrum har levet i sprogligt og kulturelt Fællesskab med det øvrige Danmark, og jeg vil lægge

sber Vagt paa dette Fællesskab; her ligger Forskellen mellem Hr. Konoy og mig. Naar Hr. Konoy ønsker, at vi maa faa mere Selvstændighed og han vil, at vi skal garantere denne Selvstændighed med vore egne Midler, saa er det konsekvent; men om Hr. Konov vil bringe dette ud i Livet og gøre det klart for Folk, hvad han vil, da vil dette ikke faa stor Tilslutning. Hr. R. Rasmussen nævnte, at Lagtinget havde givet Love og anførte et Reglement som Eksempel derpaa, men det er jo ganske urigtigt. Vi ved jo, at kommunale Institutioner sammen med Regeringen har Ret til at give Reglementer, men det er ikke det samme som Lovgivningsmyndighed. Hr. R. Rasmussens Fremstilling af vort økonomiske Forhold til Staten var ganske ejendommelig. Han mente, at vi skulde regne ud, hvad Danmark havde af Udgifter, og saa regne ud, hvad der tilkom os derefter, men jeg maa fremhæve, at det her er et stort Spørgsmaal om Indtægterne. Sambandspartiet har aldrig ment, at vi skulde betale lige saa meget som de andre, for at faa Lov til at faa lige saa meget. Vi har ikke ønsket en Akkord med Staten om en bestemt aarlig Sum, men vi ønsker en aarlig Forhandling om, hvad vi skal yde og hvad vi skal faa. Hele det Regnestykke, Hr. Rasmussen opstillede, var betydningsløst, derimod betyder de Tal, Sysselmand Samuelsen nævnte, noget; de giver et Billede af Udgifterne, hvis den Tilstand opnaas, som Selvstyrepartiet ønsker. Jeg synes ogsaa, at vi har Krav paa at naa den samme Udvikling som nede i Danmark. Vi ved, hvorledes Forholdene er, hvorledes det for os er meget vanskeligere paa mange Punkter. Vi kan ikke vente, at vi over det hele kan faa usalteret, der er Ting, der vil gaa langt mindre glat heroppe, men et gaar jeg ud fra: den danske Regering og Rigsdag vil støtte os paa bedste Maade; det er blevet udtalt atter og atter, og vi har talrige Beviser herpaa i de Bevillinger, der er givet os. Jeg kan ogsaa her nævne de Bevillinger, som vel er givet os, men endnu ikke er benyttet, Bevillingerne til Havnesagen, Vejvæsen, Telefonen, og jeg tvivler ikke om, at vi vil opnaa Støtte fra Staten til Udnyttelse af vor Vandkraft til Fremstilling af Elektricitet. Jeg ønsker ikke at opstille noget Krav paa den danske Statskasse, bygget paa formentlig Ret. Jeg vil lade Fortiden om, hvad der er sket i den; Befolkningen nede i Danmark har saamænd heller ikke altid haft det saa udmærket godt, lige saa lidt som den færøske. Vi maa arbejde med Blikket rettet *fremad*. Hr. Rasm. Rasmussen fremhævede, at vi uden vor Vilje, maaske ogsaa uden vort Vidende var komne ind under Grundloven; jeg vil aldeles ikke paastaa, at det var rigtigt, det, der skete ved Grundlovsvedtagelsen i 1849, tværtimod, men det er i og for sig ganske ligegyldigt. Færinger har nu engang godt kendt Grundloven, og de har gjort det som voksne og fornuftige Mænd. Hr. Patursson hævdede saa stærkt, at vi havde klaret os uden Hjælp fra Staten lige til 1870; maa jeg spørge: Mener Hr. Patursson, at vi skal fortsætte den Tilstand, som vi klarede os saa godt under til 1870? Det ønsker vi andre ihvertfald ikke. Det er ganske anderledes store Krav, ganske anderledes Fart i Tingene, som nu er Tale om. Monopolhandelen er for mig ndelukkende af det onde; selvfølgelig maatte den til Tider føles som en Tvang, men den Tids Mennesker forstod helt vel, at denne Tvang var nødvendig, og at Handelen for dem overvejende var et Gode. Jeg behøver mig ikke paa at sige, at Monopolhandelen efter vore Forhold dengang og efter hele den Tids Verdensudvikling var et Gode, en absolut Nødvendighed for Færøerne, Hvis den var blevet ophævet længe før det skete, vilde det have haft overmaade skadelige Følger. Det kan vi bedst forestille os efter de Erfaringer, vi har gjort i de forløbne Krigsaar med de store Vanskeligheder i Retning af Varetilførsel til Øerne. Naturligvis vil et saadant Enkeltmandsvælde let føles trykkende og det vil altid opstaa som en nødvendig Følge af manglende Konkurrence og manglende Samfærdselsmidler. Men vi har jo under Krigsaarene været nødt at gribe til det samme, til en delvis Indførelse af Monopolhandel.

J. Patursson: Meer nýtist ikki at ørðleingja hetta tosið um sogurna. Føroya saga í Ellersoes útlegging líkist ikki aftur á sogu eftirfarandis hansara Snorra Sturlasons, eiheldur dr. Jakobsens ella Trupa Føroyu sogu. Sjálvsagt er tað ein misskiljing, sum er lagað við viljа, tí Ellersoe sigur meg at hava sagt, at tá eg yvirlitsgávuvirkið fyri logtingið, so ynski eg harvið aftur hitt gamla høvdingaveldið í Tróndar tíð. Slíkt mátti eingin logtingsmaður fingið seg at sagt. Um monopolhandilin sigur Ellersoe tað sama sum hev gamlu sogdu, men merkiligt er tað kortini at hoyra ein representant fyri Suðuroyarting lova so. Tá í tíðini vóru tað Suðroyingar sum maamsterkir komu norð um fjørð til saman við Norðoyingum at krevja frihandil.

Tað, studentarnir vilja, er, at vit kunnu fáa eina opna hurð í grundlógini til at ordna okkara forfatning, um tað gerst nøvðugt og Føroyingar krevja tað. Eg vil spyrja Effersøe: Hví vil hann ikki geva Føroyingum hesa atgongd, tola teir ikki at fáa so mikla frælsi? Fer hon at drepa okkum beinan vegin, kanska?

S. P. úr Kanoy: Hr. Effersøe nevndi nakað íðni, sum eg skuldi hava sagt um Føroyinga sjálvstøndigheit. Tað er altíð vanskuligt at siga, at Effersøe gongvur nakað skeivt, tí so er tað sjálvsagt hinir, sum hava misfatað hann og gongivið hann skeivt. Men eg minnist ikki hava sagt hesi orð. Eg helt meg til tað, sum fyriliggur, nevndi til at ansa teim kendsgerningum nú eru tilstaðar, nú grundvallarbroyting er fyri hond og ritt lítið fólk eins og allar aðrar smáar tjóðir krevur loyvi til sjálvt at avgera síns lagnu. Tað kann gjarna vera, at eg ikke fái Føroyingar við til tað, men maðurin má tó vera kunnugur við, at her gror nakað í Føroyum nú, sum ikki kann kvasast, og sum eg fyrr havi sagt við kirkjustjórn og skúlastjórn: Tit skulu geva hesum gróðri gætur!

O. Effersøe: Jeg har ikke sagt, at det var, men spurgte, om det var Hr. Patursons Mening, at vi skulde have Landnamstidens Høvdingevælde tilbage. Angaaende Monopolhandelen udtalte jeg, at det var godt, at vi ikke fik Frihandel betydeligt før. Det er for mig ganske ligegyldigt, hvad Sudringer mente i 1803. Hr. Patursson spørger, hvorfor jeg ikke ønsker, at vi skal faa en aaben Dør i Grundloven. Det har jeg saa ofte før gjort Rede for, saa det bliver næppe bedre, om han faar Besked endnu en Gang. Nej, Hr. Kanoy har ikke brugt Ordet Selvstændighed, men hele hans Fremstilling bunder deri, at det er et Krav om Selvstændighed, her foreligger; det haaber jeg, han giver mig Ret i, thi ellers er der ja ingen Mening i det hele. Her er aldeles ikke Tale om, at det færøske Folk skal have Lov eller ej til at handle, som det vil, men hvorledes vi, dets Repræsentanter, skal stille os overfor det foreliggende Spørgsmaal.

Joen Poulsen: Jeg har ikke saa meget at sige. Jeg kan slutte mig til, hvad Effersøe og Samuelsen har udtalt og skal blot sige nogle faa Ord om det Brev, vi har liggende foran os. Dog vil jeg ikke indlade mig paa dets mange velklingende Ord, men blot holde mig til Indholdet. Straks jeg fik Besked om, at en saadan Skrivelse var under Opsejling rørte mig i Hu nogle Ord fra en af vore gamle Sange: »Ófrettis kvæði«: »Ungdómur og vísdómur sjáldan fylgjast að«. Da jeg saa havde læst dette Aktstykke, fik jeg en Mistanke om, at det maaske ikke udelukkende var Ynglinge, der havde været med til det, men Personer, der nok var ude over Ynglingealderen i Aar, uden at være det i Visdom. Der er jo Mennesker, som aldrig aandelig vokser sig udover Ynglingealderen. Man vilde have gjort bedst i at behandle dette som et Ynglingeforslag, som vi ikke skulde lægge særlig Vægt paa, maaske tilføre det Protokollen og siden ikke mere. Men efter hvad jeg nu har hørt, ser jeg, at det kan vi ikke gøre. Saa er det bedst at lade Sagen gaa i Udvalg; men jeg ønsker, at det bliver et Begravelsesudvalg. Men naar det ikke bliver begravet, saa gaar jeg ud fra, at det bliver vedtaget. Om det bliver fremmet til Lov og vi faar en saadan Grundlovsændring, saa forekommer det mig, at det vil gribe alvorlig ind i den Strid, som vi ellers har om vor fremtidige Stilling i Riget og bliver brugt som et meget velkommet Agitationsmiddel: »Der kan I se, hvad man vil i Danmark«. Det kan bruges som god Agitation for dem, som i Øjeblikket ikke har taget klart Standpunkt. Nu eller aldrig, vil man sige. Men om Forslaget bliver vedtaget her, og man ikke synes om det nede i Danmark, saa har man Spillet gaaende. Nu skal vi tvinges, vil man sige. Det bliver det bedste Slagord i Agitationen. Dette Forslag er skikket til, at vi kan komme bort fra Danmark. Om vi saa kommer til en anden Stat, ved jeg ikke. Jeg ønsker dette Forslag en Begravelse og anmoder om, at denne Begravelse maa blive forsvarlig.

J. Patursson: Tað hevnar meg, at okkara eldsti tingmaður brúkar slík orð um hetta skrivilsi, og at hann gongur út frá sum aldeilis avgjørt, at hesir menn vilja hava eina agitatiónsfrá ídag, sum er fyri at koma burt frá Danmark. Tó má hann vita, tá hann lugsar seg um, at tað er tað ikki, men at teir vilja, at nakað gott skal vera gjørt fyri teirra land og fólk. Hann vildi seta tað fram, at mugldómur og vísdómur fylgjast sjáldan at. Hartíðni vil eg seta: »Tað vaksa ongum rakka hvassar tenn í gómin«. Tað vil vera hetta, sum tíðin gevur rætt og gevur hon. Í hesum fáum burt, sum hin gamli maðurin vil. Koma hesir studentar til bygd og emkeri í Føroyum,

so vilja teir loggja tairra skorv til fravna fyri landið og ikki fyri at skaða tað.

J. Poulsen: Eg gloymdi at siga, at tað tjenar til undskyldning hjá studentunum, at teir eru ungir.

Próstarnir: Eg havi hug at siga nokur fá orð um hesa sak í almindiligheit. Tá hetta studentabrævið kom heim til Føroya ein dagin í summar, vóru fólk kannske heldur bilsin. Tað kom sum ein kvokkur í summi. Og eg hugsi, at tað eisini vóru fólk, sum ódnaði um hjartað, tí tað var gleðiligt at siggja hesar ungu føroysku menn ganga sameintir saman um hesa stóru sok. Tað er her idag hildið vanvirðisliga nu málið, sum hetta brav er skrivað í. Eg haldi ikki, at her er stórvegis at finnast at. Hví ikki loyva ungum studmntum at taka nakað stórliga til orða? Teir hava her nýtt eitt prútt og vælljóðandi mál, um kanske ikki eg hevði sett brævið saman við sonn orðum. Her er hildið, at hesir studentar eru býttir, og gera býttar gerðir, tí ungdómur og visdómur fylgjast sjáldan at. Men ungdómur og visdómur kunnu eisini vera í felag. Og tað eru teir ungu, sum einaferð skulu byggja landið. Vit mugu allir minnast á hvat tíð og undir hvorjum viðurskiftum hetta brævið er komið fram. Tað hava jú gingið stórhendingar um alla verðina og fólk, bæði stór og smá, hava tikið tok fyri at verja um teirra lunnindir sum fólk. Og tað vildi vera ein merkiligur ungdómur og ikki minst merkiligir studentar, sum hevdu livað so nær upp at hesum hendingum, og eingi hevði rorst í teimum av tí, sum lá í teimum heimum frá, og tann neisti, sum lá í teimum sum Føroyingar, ikki varð kveiktur. Her eru allir studentarnir sameintir. Og hettar hevur nimt meg á nakað, sum eisini hevur hent í Keypmannahavn, men fyri 100 árum síðani, og millum studentar. Tá var tað íslendskir studentar. Tá gingu eisini stórhendingar um heimin. Og tá íbirti íslendskir studentar verk, sum hava lagt grund til tað, sum nu er avrikað í Íslandi. Tað vóru hinir tiltiknu »fjølnismenninir«. Hetta hjá teim føroysku studentunum kann ikki metast í virði við verkið hjá íslendsku studentunum. Men tað minnir um tað. Vit eru her 100 ár aftanú Íslendingar. Fyri mær er tað so sum at hesir spurningar fyrst og fremst er ein soguligur spurningur. Frá tí grundlógin var smíðað og hon var gjord galdandi í Føroyum hevur hesin spurningur verið uppi ferð eftir ferð, og og vanti, at eins og hann hevir stungið fram av og á síðani, vil hann halda soleiðis við, um vit ikki koma til greiðu í hesum máli. Hetta er eisini ein praktiskur spurningur. Vit motast allir í tí, at vit vilja hava framstig her á landi, og eg trúgvi, at vit motast eisini í tí, at vit vnskja, at løgting okkara má ganga á odda fyri at gera framstigið so gott og so sunnt sum moguligt; men eru vit sansintir í hesum, so moga vit eisini vera sansintir í, at løgtingið má nemast so nógv, at tað verður fort fyri hesum. Men hvussu skal tingið nemast? Harum kunnu meiningarnar vera ymisar. Her í brævinum frá studentunum er víst á eina leið, tað kann talast og ráðast aftur og fram um hana, men eg dugi ikki at siggja annað, enn at teir her eru á rættari leið. Nú láið tíðin er til eina broytan av grundlógini, so er tað spurningurin, um ikki netupp henda løta má nýtast til at fáa okkara rásir hildnar frían í framtíðini, so teir ið koma aftan á okkum kunnu sjálvir sleppa at ráða fyri, hvussa teirra landaskipan eigir at vera. Studentarnir vilja enga broytan hava nú; teir vilja bert hava lyfti um, at um so verður í Føroyum, at meginpartarin av fólkinum í framtíðini ynskir at skipa fyri landi á annan hátt enn nú, um tað tá tykist nevðugt, at tað so skulu vera gotur opnar fyri at kunna fáa hetta gjort, og at vit ikki tá skulu vera førdaðir og heftir. Eg skilji væl hesar ungu studentarnar. Teir vilja óivað taka teirra part av tí arbeiði, ið liggur fyri at gera fyri at hjálpa landi okkara upp. Her hava vit í Føroyum staðið og barst og klandrast um okkara politisku stoðu nú í mong, mong ár, og tað er skiligt, at teir ungu ið nú koma til, eru leiddir av hesum, og ynskja at koma burtur úr hesum yrkisleysa, spillandi stríði, og fáa arbeiðisfrið í landinum. Tí vilja teir fáa okkum lyfti um, at vit kunnu fáa hetta skipað, sum vit vilja, um vit eina ferð í framtíðini ynskja eina broytan, so vit kunnu nýta tu tíð, ið er okkum mest, til tað uppbyggingar arbeiði, ið okkum er so stórur torvur á. Eg vil fyri mín part verja hesar studentarnar fyri at vera skyldaðar fyri at vilja nakran skilnað frá Danmork, nei, teir vilja vísa á eina leið, eftir hvorjari vit kunnu koma burtur úr tí nyttuleysu klandri, okkara politikkur í heimi seinastu árum hevir verið. Hetta er ikki at skilja sundur, men at vísa á eina leið til at koma í eitt gott samfelag við bróður okkara harnidri á einum nýggjum og betri grundarlagi. Tað er sagt her í dag, at henda tíðin hevir víst okkum ein nýggjan, stóran tanka, samlingstankan,

og tað er nakað satt í tí; tað er ivaleyst, men javnsíðis við hesum tanka gongur ein annar, ið ikki hevir minni framma, nevniliga at royna at skilja tað sundur, ið hevir verið bundið saman og ongantíð hevur hóvað saman, tí nógv hevir verið saman, bundið saman, ið aldri hevir kunnað rummið saman, og tað vil altíð valdað skaða, fyrr ella seinni. Her er nakað, vit mega geva gætur. Vit Føroyingar eru ein fólkaflokkur fyri okkum sjálvum, kanska tann minsti fólkaflokkur í heiminum, men vit eru eina ferð eitt fólk fyri okkum sjálvum, tað nyttar einki at stríðast um tað. Tað er sagt her í dag, at vit vilja ikki vera Danir, men at summir heldur vilja vera Norðmenn, og summir brellast eftir at vera Íslendingar. Eg vil siga: vit eru ikki Danir, vit eru heldur ikki Norðmenn, heldur ikki Íslendingar. Vit eru Føroyingar, og síðani danskir statsborgarar. Vit eru Føroyingar; tað hevir tíðin, søgan, lívið her í Føroyum gjørt okkum til; her er ein munur millum okkum og øll onnur fólk, og tann ið ikki rokuar við hesum muni, hann fer skeivur og kemur at renna seg fastan onkuntíð. Vit kunnu ikki roknast sum Danir á sama hátt sum t. d. Sælendingar ella Lálendingar, og tað er undarligt at hugsa sær, at vit nakrantíð eru sambornir við teir á hendan hátt. Lat tað vera, at vit í langa tíð hava haft søgu saman við Danmork, vit hava kortini eisini haft okkara sersøgu, og vit hava eitt mál, ið er okkara, og sum eingin annar fólkaflokkur hevir; og hetta má hugsast nú, tá vit vilja byggja landið upp. Hetta skerst ikki burtur, og um tað verður roynt at skera okkara fólkaeyðkenni burtur, tá vil tað bloða í beni, og tað er ein spurningur, um tað tá ikki verður so meint, at tað verður óbotandi. Eg haldi, at vit eiga at takka hesum føroysku studentunum fyri hetta, tí hetta er gjort í einari góðari stund, og enn meira, tað er gjort av góðum hjartalagi. Eg rokni við, at ein stórur partur av hinum danska fólki skilir okkum og vil hjálpa okkum at koma á eina leið, hvar vit kunnu liva og mannast sum fólk, í semju og samkoma við teimum hartnýri, hjálpa okkum fram á eina stoðn, ið vil verða báðum fólkum til gagns og til sóma.

A. Samuelsen: R. Rasmussen tosaði nokur orð um tað, og hevði nevnt R. Rasmussen segði tað sama sum tingmaðurin í Kirkjubo hevir framhildið, at tað ráddi um at fáa okkum eina hurð, eina fram-hjáhurð, ið vit skulu kunna sleppa út igjøgnum í framtíðini. Eg meini, at táið skal vera tala um nina hurð, hvarigjøgnum vit í framtíðini skulu kunna fara burtur frá Danmark, langt burtur sum R. Rasmussen sigir, lat tað fólkaslagið, ið tá livir, hugsa um hetta. Teir siga, at teir koma fram við hesum nú, tí nú er tíðin inni til eina grundlógarbroyting, men tað var jú eisini grundlógarbroyting í 1915, tá var einki tos um hetta, sjálvt ikki studentarnir tosaðu um hetta, tað var ikki fyrr enn aftan á, at hetta tosið kom fram. Vit vita jú, at allar tær broytingar av grundlógini, ið teir vilja hava niðri í Danmark, tað fáa teir ikki igjøgnum. Okkara separatistar, R. Rasmussen og J. Patursson, vilja benytta hetta eygablikk og siga, at við hesum skal einki gerast nú, tað skal yvirlatast til framtíðina, hetta skal bara vera ein hurð, ið skal latast upp; nei, í somu stund, sum hetta er gjørt, vilja separatistarnir benytta hetta við tað sama, sjálvstýrismenn vilja krevja hetta við tað sama. Studentarnir yvirskja einki stungið undir stólin; tí forstandi og ikki, at teir ikki eru gingnir langt viðari í teirra kravi, tí einstakir av teimum veit eg vilja ganga langt viðari strax. So hetta má vera, hvat teir hava kunnað einst um at krevja, ja tað er ein spurningur, um teir allir hava stemmað fyri hesum. Eg antaki, at táið studentarnir hava uppstilla hetta so óskyldugt, so er tað tí, at teir ikki hava kunnað sameinast um tað, sum aftanfyri liggur og eisini fyri at fáa lokka Føroyingar við. Tað sama er tilfeldi við sjálvstýrismonnunum -- Rasmus Rasmusson tó undantikin; hann hevur sagt, hvat hann vil. Vit skulu hava eina opna hurð, siga teir, men so er tað vel eisini meiningin at ganga igjøgnum hana. Rasm. Rasmusson sigur, at Føroyar eru forsomdar, ja, tað kunna vit takka okkum sjálvum fyri, tað er logtingið, sum her hevur alla skyldina fyri tað. -- So sigur hann, at vit eiga ikki at falla í fátt av nokrum stórum tolum tað kann vera: og havi nevnt milliónir, men tað er jú ikki bara hesar pengarnar, vit avskera okkum frá, men eisini øllum teimum fordelum, sum vit hava av felagsskapinum, og bara liva av tí, vit sjálvir kunnu skaffa okkum. Men tað er tó óforsvarligt, tá tann hevur ein góðan stilling, so at gera, hvat mann kann fyri at fáa ein ringari. Rasm. Rasmusson hevur av góðum grundum einki sagt um tolini, og nevndi. Tey vóru rett nokk, tað einasta skuldi verið, at tey vóru ov smá. Men sjálvtum vit bara hulda okkum til tað eini milliónina, so verður tað tó 50 kr. upplá hvørjum høvdi her í oyunum. Tingmaðurin í Kirkjubo

mælti á sinni til at leggja 30 kr. í koppskatt uppá hvort mannsbarn í Føroyum, tá til stykki kom, tordi hann ikki at standa við tað, hann var bangin fyri, at Føroyingar skuldu bliva heilt forskrektir — nú er talan um 50 kr. uppá hovdið. Eg vil gjarna síggja um Føroyingar fara at syngja Dávids sálmar tann dag, tað verður líknað 50 kr. uppá hvort hovd í Føroyum og teir samtíðis verða avskornir frá øllum felagsskapi við øllum teim ólukkum, tað førir við sær. Patursson letast so forharmaður um, at sambandspartíið ikki vil vera við til at halda hesa ognni hurð — tað er bara skoðuspæl. Hetta skal gerast so óskyldugt, at tað á somu tíð skal kunna glíða niður í tingmenninar, tað føroyska fólkið og menn niðri í Danmark. Hesin politikkur hevur verið fardur fyrr. Men tað fer ikki at hjálpa teimum hesa ferð. Føroyingar vita nú, hvat tað goldur, teir ganga ikki í felluna. Patursson tosar um, at dersum hesin spurningur verður lagdur fram fyri Danskarar, so sum hann er, uttan umsveip, so vilja teir ganga við til hann. Ja, kunnu vit fáa danskar lóggevarar til at trúgva, at hetta vil knýta okkum fastari til Danmark —, men tað fáa vit teir ikki at trúgva, og tað er heldur ikki tað, studentarnir vilja. Teirra formál er at koma á sama stilling sum Ísland, og tað er tað, vit skulu taka stilling til. Vilja vit fara so langt sum Íslendingar? Tað er spursmálið. Fyri tað kunnu vit vera góðir við Danmark. Men Ísland er nú fullstendiga separerað frá Danmark, tað mugu vit gera okkum klárt.

Tingmaðurin í Kirkjubø heldur, at vit kláraðu okkum gott til 1870. Tá hevdu vit monopolhandil — lugsar hann kanska um at innføra hann aftur? Tað hevur hoyrst gramt um tað, men tað vilja vit ikki ganga við til fyri at skaffa pengar í okkara kassar. Hann minnist lugtikin aftur á hovdingaveldið í gamlar dagar —, men hvussu var fólkið stætt tá! Guð forbjóði, at Føroyingar skulu uppliva tær tíðir aftur, tí tað var forferdiligt sum fólkið hevði tað tá. Gud forbjóði, at Føroya fólk aftur má uppliva ta tíð, sum tingmaðurin í Kirkjubø ynskir at grava upp aftur! Tá var alt tað fólkið traðir, sum nú sum frír menn eru úti og sigla; teir máttu trøla undir húsfrúnni í Hósavík, bispinum í Kirkjubø og øðrum stórdýrum. Far og spyr okkara fiskarar, um teir vilja hýta. Spyr teir!

Tað bleiv brixlað Jógvani Poulsen, at hann hevði hánað studentarnar. Eg standi her við einum blað av Tingakrossia, hvar tað er skrivað, at sjálvstýrismenn yvirfyri studentunum hava alla grund til at siga: Harrin bevari meg fyri mínum vinum; óvinum mínum skal eg sjálvur vita at vara meg fyri! Her eru studentarnir hánaðir og tað til munns.

Prósturin helt eina langa talu, men hann segði einki um, hvussu hann sjálvur vildi stilla seg í hesi sak.

Patursson nýtir ikki at undskylda studentarnar. Eingin hevur lopið á teir. Teir áttu at líða við hesum spurningi til teir komu aftur til Føroyar at vera. Men meðan teir lesa í Koypmannahavn kundu teir lata okkum um at rokja landið. Frá tí, at hesin spurningur er reistur, er tað sikkurt, at tað stríð, sum hevur verið í Føroyum fyrr, hevur verið nógv verri, utan at Foroya fólk tekur sær um reiggj og sigur, at vit ikki vilja vita av hesum. Annars verður tað klandur. Próstin sigir, at frá tí tíð, at grundlógin var smíðað, hevur talan verið um at fáa brovtt. Í 1915 vóru Føroyingar tilfriðs. Teir vóru hinmalglaðir og kappnøgdust um at siga ja, sjálvstýrismenn ikki minst. Og tá var ikki talan um at fáa nakra opna hurð at sloppa ígjognum, alla at fáa nakra grundlógarbroyting. Próstin sigir, at hesir studentar ikki ynskja grundlógarbroyting nú. Teir framseta tó greitt, at vit vilja hava eina aðra stoðu. Próstin sigir, at allir studentarnir her eru samsintir. Men tá vit vóru saman í Danmark, vóru ikki allir studentarnir tilstaðar. Eg siggi soleiðis á hesa sak, at hettar er fyrsta streikuvarsil. So sigst tað her, at um vit fáa hendan rætt, so vil alt bliva tað sama sum áður. Men tá vit hava skipað tað soleiðis, at vit hvønn dag kunna fara okkara veg, so verður tað ikki tað same. Eg kann ikki lugsa mær til, at nøkur frá okkara felagsskassa kann seta nýggjar fyritokur í verk aftaná at hetta er komið í lag, heldur ikki, at statskassin skal gova studna til hánaðarskúla, ella til havnirnar. Tað okkum siggja, hvat lovgevningsmaktin ger aftaná at vit hava lingið lóggávuvald. Vit kunnu tá ikki vera bekymbir at krevja studna til nýggjar fyritokur. Samhandsmenn vilja aldri geva upnat at halda uppá okkara núverandi stoðu. Próstin sigir, at tá alt hetta er ordnað, tá kunnu vit samarbeiða við Danir, men á øðrum grundarlagi. Men tá man felagsskapurin ikki fara at vera so stórur. Føroyingar eiga sína egnu sogu og sínt egna lummindir, men teir hava eisini eina felagssogu og felagslummindi, sum teir seta prís uppá. Vit eru Føroyingar og danskir statsborgarar

sum fola sag vael innanfyri bað danska markið. Það er bara í síðstu 20 árini, at nakar hevur folt sag illa við at vera har. Teir siga, at vit vilja skera føroyskt burtur. Það vilja vit ikki gera í minsta máta; men vit vilja bevara danskt har sum fólk hevur brúkt það her: í skúlunum og í kirkjuni. Það er ikki at skera føroyskt burtur. Men um okkara stafsrættaliga stríð verður broytt, so vil eisini danskt mál verða víst burtur úr Føroyum meir enn það er nú. Um lógtingið ífjor hevði haft lóggávuvald, so hevði danskt mál ikki longur verið lærumál í okkara fólkaskúlum. Og það bleiv ífjor úttalað, at føroyskt eisini átti at vera talumál í veal- og millumskúlanum. Og aftaná skuldi vael koma lærarasknlar. Men tílíkt halda vit sambandsmenn vera ein óhukka fyri Føroyar. Nú sigir mann, at það er það unga fólkið, sum kemur við hesum og vil vinna framm við tí, og aubin vit fara fyrr ella seinni til það, það má gera það sama. Men um nakrir studentar og yngri og eldri sjálvstýrismenn vilja það, so er ikki sagt, at føroyskur ungdómur yvirhovur vil það. Heldur nitannu teir halda, at hetta er óðamannaverk. Það er ikki tvívl um, at tann ungdómur, ið er, vil slotta seg til okkara, og at tann, ið kemur, vil sluttа seg til okkara, ivish eg ikki í, tí tann ungdómurin vil royna at búgva seg til at fara útí verðina, og vil tí ikki lata seg steingja inni og lyrgja fyri, soleiðis sum sjálvstýrismenn vilja. Lat okkum tí ikki forskrekkjast av tí, at það verður sagt, at ungdómurin er við sjálvstýrinum, tann tíð kemur, táið ungdómurin skilir, hvat ið tjenar honum best, og hann fer har, hvar man ikki vil splitta, men samla.

O. Effersøe: Hr. Patursson sagde, at Fremtiden vilde give Ungdommen Ret. Ja, saa kunde godt Hr. Patursson og Provsten og jeg pakke sammen og overlade det hele til Ungdommen. Sagen er jo den, at vi gennemløber forskellige Trin. Først er man Barn, og det Trin behoves ikke at omtales i denne Forbindelse, saa er man i Ungdommen; da er man gerne mere fremfusende. Men Ynglingen bliver Mand, og da bliver han mere besindig, og han faar Lejlighed til at sætte sig mere ind i Sagerne. Jeg synes, at naar de Mænd, der nu er unge nede i København, engang bliver Mænd, da vil de tage Stilling til, hvad de har sagt i deres Ungdom; holder de det for rigtigt, vil de stræa ved det, og hvis de skulde være kommet frem til en anden Opfattelse, da er det jo ikke andet end hvad ofte sker, naar Besindighed og Modenhed afløser Ungdommens mere fremfusende Opfattelse. Der blev fremhævet de skarpe Tænder, Ungdommen har, ja, men man bruger sine Tænder forskelligt, og netop som jeg fremhæver det, den modne Mand bruger sine Tænder mere besindigt end Ungdommen. — Hvad ligger der i dette Brev? Jeg synes, det er et svævende Spørgsmaal; jeg ser ikke andet, end at man vil lade en Dør aaben i Fremtiden. Jeg har ikke været til Stede, da Brevet blev affattet, jeg ved derfor heller ikke om der har været fuld Enighed derom; det kan godt være, at der har været Studenter, der ikke har villet være med til dette Brev, og hvad deraf vil følge. Der er blevet agiteret med Beskyldninger, der fra Samhandlspartiets Side skal være blevet fremsat mod visse Mænd, saaledes at Provsten skal være blevet beskyldt for at være Selvstyremand; ja, i Dag har Provsten holdt en Tale, som jeg ikke synes var saa heldig. Han værgede Studenterne og sagde, at vi havde kritiseret Sproget; jeg har ikke kritiseret Sproget i Brevet; jeg sagde maaske, at det var store Tanker i et svulmende Sprog og jeg sagde, at Sproget svarede ikke til Indholdet, men hvorvidt det er godt Færøsk eller ikke, har jeg ikke udtalt mig om, og det er jeg ikke tilstrækkelig Sprogmand til at gøre. Provsten fremhævede, at Studenterne var utilfredse med den nuværende Kiv og Strid og vilde bringe Fred; jeg synes, at det er en underlig Maade at bringe Fred paa, og at dette Forslag tværtimod vil skabe en voldsom Agitation. Jeg kan sige, at Forslaget er vel fremsat i en god Mening, men det vil ikke bringe Fred, det vil medføre en Strid, der kan føre os hen i den Stilling, Island har i Øjeblikket: den Fred kan blive for dyrt købt. Med Hensyn til, hvad man har hørt af Krigen, sagde jeg ingenlunde, at det udelukkende var Samlingstanken, der er ogsaa andre store og gode Tanker, men for mig staar de gode internationale Tanker som Hovedsagen, deriblandt Kristendommen, det er noget, der er godt, der er gavnligt, og hvis Menneskene havde benyttet den, som den skulde benyttes, var vi ikke kommet ind i den nationale Kamp, der har medført denne forfærdelige Krig. Provsten gjorde sig skyldig i samme Fejl som Hr. Konov. De fremstiller Sagen altfor simpel: Færøisk er vort Sprog, vi har vor egen Historie, vi er Færinger o. s. v. Nej, det er altfor ensidigt fremstillet. Vi har en fælles Historie, som vi ikke kan se bort fra, og det

undrer mig, at Provsten ikke har opdaget, at det danske Sprog har en stor Berettigelse her paa Øerne, hvilken Kærlighed, Folket har til det, og hvor meget det skylder det. For Provsten er vi Færinger, og saa desuden; kun danske Statsborgere. Det er en grundfalsk Opfattelse. Hverken vi Sambandsmænd eller overhovedet nogen vil skære noget af det bort, som Færinger ejer. Er der nogen, der vil skære noget bort, da er det Selvstyremændene. Provsten fremholdt, paa en vis, truende Maade, som det er Skik mellem Selvstyremænd, hvilket Ansvar vi vilde paatage os ved den Strid, der vil opstaa mellem Færinger og Danske; men vi tilstræber ingen Uenighed, det er d'Herrer Selvstyremænd, der vil skabe Ufred. Vi har talt saa længe, at der vel ikke fremkommer noget nyt under Diskussionen. Der var blot et lille Punkt, hvorom jeg vil gøre en Bemærkning til R. Rasmussen. R. Rasmussen lægger saa megen Vægt paa den Uret, vi skal have lidt af den danske Stat. Det er mig ikke bekendt, at vi har fremsat Ønsker og Krav fra vor hjemlige Repræsentation, som ikke er blevet opfyldt. Det eneste, der kan siges i den Retning, var i en bestemt Periode, da Hr. Patursson var Folketingsmand, da gik efter hans Fremstilling det hele i Baglaas, men hvad der skete bagefter, viste tilfulde, at det hele var i bedste Orden, og at vi kunde faa alle de Bevillinger, vi forlangte. 1—2—3 saa staar det der! Nej, der skal selvfølgelig skaffes Oplysning om Sagerne. Det vil tage Tid, kortere eller længere. Maaske vore Krav ikke bliver opfyldte i Øjeblikket, men det kan ikke paavises, at vore *rimelige* Krav ikke er blevet opfyldte.

Sakin varð beind til nevndinaviðvíkjandi løgtingslógini og skattalógini.

Fundur tisdag 2. september.

Haldórsvík sum serstok kommuna.

3. viðgerð.

S. P. úr Konoy: Fyri nokrum árum síðani bað forstandarskapið fyri Norðstreymoy um at skilja sóknirnar sundir sum serlig kommuna. Tingið innstillaði, at man gav játtilsi til tað. Tað hevur vist sog, at teim í Haldórsvík dámar ikki, at Saksun er við teimum. Teir halda, at tað er ólagaligt og meina, at Saksun eigir at hoyra til Hvalvíkar. Hvalvík og Saksun hava lærari til felags. Síðani kann talan vera um at fáa Tjørnuvík og Saksun saman, men hetta er ikki gott at fáa ílag. Tingið samtykti at spyrja Saksun um teimum dámdi at vera fyri seg sjálvan ella teir vildu vera saman við Hvalvík, ella Haldórsvík. Við avstemningini vóru 13 veljarar í søknini og 9 av teimum hava stemmað, og teir hava stemmað fyri at Saksun skal hoyra til Hvalvíkar. Nú hoyrir Saksun til Haldórsvík, sum tegin vil sloppa frá Saksun. Men vit vita ikke, um Hvalvík vil hava Saksun. Hendan sakin hastar ikki, og vit í nevndini vilja tí, at mann fyrst letur spyrja, hvat Hvalvík vil. Ég skal mæla til, at okkara uppskot um hetta verður samtykt.

H. Samuelsen: Nú hava ¾ partar av Saksun stemmað fyri at vera saman við Hvalvík. Ég forstandi tó ikki, at tað er avgjørt av hesum, at teir ikki vilja dømma egna kommunu. Nú skuldi mann trúgva, at sakin var upplogd, tí Saksumingar hava stemmað fyri at hoyra til Hvalvíkar. Men sakin vísir seg nú ikki at hava loysna við betur; tí nú skal Hvalvík fyrst geva orklering. Sum forstandaraskapið í Hvalvík stillaði seg síðst er ikki stórt hop um hetta. Saksun ynskir sjálv at sleppa leys frá Haldórsvík, ikki tí at hesir báðir partar ikki hava komið væl út av tí – – tað hava teir notupp gjørt – – men tí, at Saksun fólir, at teir ikki hoyra reiðiliga saman við Haldórsvík. Vit mugu siga, at skaparin sjálvur hevur motiverað teirra ynski við tað, at hann hevur sett stór fjall ímillum hesar bygdirnar. Íbaðin fyri hevur hann lagt teimum ein slættan veg --- Saksunardal — omanat til Hvalvíkar, meðan hann millum Haldórsvík og Saksun hevur sett tvær festningar, sum ikki altíð eru tíðligir at koma yvir um. Tað kann ikki vera talan um at ordna skúlaviðurskiftini um Tjørnuvík og Saksun skulu vera saman. Tí ímillum hesar bygdirnar eru fjøllini ring at ganga. Og niður til Saksunar er onn verri. Har kann lærarin spæla líka á Pollin og man vil ikki fáa annað enn skinnið aftur av honum. Ég eitli, at teir munnu læra og missa ein lærara har um árið. Tað verða skrivaðar so stórar bøkur um teir, sum missa lívið við Norðpólin, men eg lugsi ikki, at tað verður skrivað nógv í historiuna um teir missa nakrar skúlalærarar í Tjørnuvík.

Vilja Hvalvíkingar hava Saksun alfrat sær, so onganlið betri; men eg vil ikki, at resultatið skal hvíla á, hvat Hvalvík sigir. Tað er logtingið, sum hevur ansvarið. Tað er ikki Hvalvíkar sókn, ið skal bera ansvarið fyri, hvussu skúlaforholdini verða fyriskipað her, tað er logtingið, ið hevir ansvarið, og eg vil eisini leggja ansvarið í Saxun, ið fordar fyri einari góðari skipan. Tað er eingin bygd, ið liggur so illa fyri, og vit mega hjálpa teimum til at fáa framgongd, vit mega á allan hátt hjálpa teimum til at koma saman við oðrum nærliggjandi bygdum. Eg kann ikki stonnna fyri hesum uppskoti frá útvalginu.m

S. P. úr Kunoy: Tað er eitt sindur kediligt, at tingmaðurin úr Haldórsvík ikki vil stemma fyri okkara uppskoti, men tað er heilt natúrligt, at Hvalvíkarsókn má verða spurd, áðrenn Saxun verður lagd aftrat sóknini, um teir í Hvalvík vilja hava hetta. Nú eru Saxun og Haldórsvík saman; tað er skuld fyri fátum árum síðani, og tá mega teir altso ikki hava ansað eftir øllum hesum, ið nú sigist at forða. Eg kann ikki trúgva, at tað man vera stórt meira torfort fyri lærarar at koma frá Kunoyarbygd til Skarðs ella frá Mikladali til Trollanes, og har gongur kortini ein lærarinna. Hetta er ein prinsipspurningur, og eg vil mæla til, at vit spyrja Hvalvíkingar fyrst, um hvussu teirra stoða er. Tað man helst vera, at teir ikki hava stóran hug til hetta samband, men kanska teir vilja taka eftir tingsins innstilling.

M. Samuelsen: Kunoy sigir, at tað er ikki fyrikomið fyrr, at leggja tvær sóknir saman uttan at spyrja báðar fyrst. Táið Saxun og Haldórsvík komu saman, vildi Saxun vera serlig kommuna og Vik eisini, táið vóru bert ov lítir veljarar, ið hovdu stemmað, uppskotið varð sett framm í so óheldugari tíð, mannfólkini vóru ikki heima, og konufólkini komu sær ikki uppí. Men at Saxun og Haldórsvík komu saman, tað var móti, hvat báðir partar ynskta, ynskið var bert ikki framsett við so stórum fleirtali, sum krevst. Hvat ið Hvalvíkarsókn meinar nú ikki leggjast til grund fyri avgerðsinum. Hitt gamla forstandarskapið komi og, teir vilja ikki hava Saxun alfrat sær, kanska hetta nýggja er øðvísi, eg veit tað ikki. Eg skal ikki uppihalda sakini longur, men stemma fyri forslagnum frá útvalginum kann eg ikki.

Uppskotið varð samtykt.

Frítaking fyri at vera limur av valnevnd.

2. viðgerð.

S. P. úr Kunoy: Hetta er ein heilt lítil sak. Her er komið brev til tingsins frá einum manni í Suðuroy, hr. skipara D. J. Dahes Mortensen av Tvoroyri, hvarí hann biður um at verða frítikin fyri at vera limur av valnevndini. Tað eru ongar upplýsingar givnar í brevinum um hví maðurin vil sleppa frí; tað stendur heldur ikki, hvussu gamalur hann er, og sakin er í tað heila tikið áldeilis einki upplýst. Um kommunala nevndin hevir kortini meint, at maðurin má hava sínar grundir til at biðja seg frítiknan fyri hetta starv, og við tað, at vit ganga út frá, at tingmennirnir av Tvoroyri kenna mannin og vita um hansara viðurskifti, skal nevndin mæla til, at tingið svarar uml Tinget vel de foreslaaende Valg af Valgnævn imødekommer Andragendet«.

Hetta varð samtykt.

Viðtoka um oðuvoiðu.

2. viðgerð.

S. P. úr Kunoy: Eldri tingmenn vilja minnast, at í 1914 lá bonarbrev her frá fólki í Vík og á Eiði, hvarí tey klagaðu yvir, at oðan har norðuri um leið varð oyddi av monnum ið komu frá oðrum bygdum í stórum flokki, og við reiðskopum, ið skjótt vildu ovda oðrum með alla. Tað varð tá gjørt ein samtykt um, at oðan bert skuldi takast har við ródnarbátum og teir skuldu ikki hava meira enn eitt fastsett tal av dreggjum. Tann samtyktin var staðfestað av ministeriinum sum galdandi í 5 ár. Tíðin er nú úti, og menniskir har norðuri, ið hava verið tilfredsir við samtyktina, hava nú kunngjørt alla staðin í Eysturoynni og Norðstreymoy, at teir ætla at fáa hana gjørda galdandi aftur í 5 ár, og tað vísir seg, at eingin hevir talað móti hesum. Nú biðja teir tingið hjálpa teimum til at fáa hana gjørda galdandi fyri tey fyrstu 5 ár. Nevndin heldur, at táið teir, ið hava livað undir samtyktini, halda hana vera góða, er eingin grund til at broyta hana, og nevndin hevir tí framsett soljóðandi

uppskot: »Medfølgende Forslag til Vedtægt for Fangst af Muslingen søda« i en Del af Sundet mellem Strømø og Østerø anbefales til Justitsministeriets Stadfæstelse som gældende Vedtægt for et Tidsrum af 5 Aar fra 1. Januar 1920 at regnes.

M. Samuelsen: Sum ørðforarin segði kom tað í 1914 eitt bmarbrøv norðan úr Vík og av Eiði um at fáa eina viðtøku fyri veiðu av oðu har norðuri. Tað var serliga av tí, at teir brúktu ein reiðskap á motorbátum, sum teir rópti nðukassar, og tað vísti seg, at tann máti vildi skjótt oyða oðuna, tí hesir menn brúktu hetta sum handverk og seldu øðnna til spekulatión. So gjørdu vit hesa viðtøku, og tað var fyrst sterkur mótstandur, serliga frá teim monnum, ið brúktu handa reiðskap; men nú hevir eingin nakað ímóti hesum, og eg skal tí nógv anbefalla hesa sak. Um hetta ikki kemur í lag, vil oðan skjótt oyðast, og oðnu er so gott agn, at ikki kann hon væl umvarast.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Lonhækkun til djóralæknans
(2. viðgerð) og
Motorbátur til djóralæknans.
2. viðgerð.

Formaðurin framsetti uppskot um, at hesar báðar sakir komu saman til viðgerðar. Hetta varð samtykt.

J. H. Poulsen: Tað kom í ár til tingið bræv frá djóralæknanum, hvarí hann biður um, at tann fasta lon, ið varð samtykt ífjor til ein djóralækna í Føroyum, verður hækkað; hann gongur út frá, at hann verður útnevndur og fyrisitur, at lonhækkingin fer afturvirkandi kraft; enn meira biður hann um hús at búgva í ella eitt leiguviðurlag. Vit hava hugsað nógv um hetta í nevndini, og meina ikki, at vit kunnu fyrisláa nakað í hesi sak, við tað, at eingin djóralækni enn er útnevndur. Lønin var fastsett undir dýrtíðini, og umtmaðurin varð biðin um at fregnast í Íslandi um, hvat tann fasta lønin har var fyri djóralæknar. Takstirnir eru eisini settir eftir teim íslendskn og meiningin hevur í tað heila tikið verið, at hesin djóralæknin skal hava sama økonomiska stilling sum djóralæknarnir í Íslandi. Teir fáa dýrtíðartillegg, men tað eru vit ikki vissir í um hesin fer, so sum ordningurin er, men vit halda tað vera ynskiligt. Í hvussu er meina vit, at tað vildi verið forhastað nú at áseta hesa lonhækkan og tilráða tí tinginnn at samtykkja, at undragandi ikki kann ímotukomast.

Her fyriliggur so eisini ein annur suk frá djóralæknanum um anskaffilsi av einum motorbáti til ferðaflutning. Hann sigur tað at vera nøvdugt, men tó at útvalgið í hovuðsmálinum kann vera samsint við honnm halda vit, at tað er best at stoggja nakað enn, áðrenn vit fyritaka ein slíkan foranstaltning. Eg skal tí mæla til, at vit samtykkja útvalgsins forslag.

J. Patursson: Tað er ikki longri síðani enn í fjor, at djóralæknin tók við sínum starvi, og enn er hann ikki settur í embæti. Eingin er tó í iva um at hesin maður í allar máta hóskar væl fyri okkum, raskur, iðin og beinasannur sum hann er. Uppgávurnar, ið liggja fyri honum eru bæði margar og stórar: tað er ikki einans tað at hjálpa fólki við teirra sjúku kríatúrum, men eisini við granskan av sjúkum, sum hava gjørt og kunnu gera so nógvan skaða í okkara fenaði, kann hansara virki fáa ómetuligan týðning. Við hin tilnevnda búnaðarskúlan verður hann sjálvsagt eisini nýttur og ikki minstan týðning kann hansara starv hava fyri at fáa Føroyingar at taka seg saman til felagsoyndir í landbúnaðinum. Tann lon, sum áseta var ífjor, var miðað eftir íslendskum fyridømi, men tað er kanska ikki beint, nú hann skal verða embætismaður deilvis lontur av statinum. Óivað verður tað nøvdugt at hækka hesa lon, men tá eingin fastur djóralækni enn er settur ber tað ikki væl til longu nú at bøta um hann og eg havi tí sett fram uppskot um, at vit skyggja hetta spurning, so hann verður uppiskin aftur næsta ár. Um sama tíð mugu vit eisini fáa hækka lønina til búnaðarráðgevarn okkara, tí hon er so langt undir tí, sum tílíkir menn hava í Danmark, og svarar als ikki til, hvat samlkið lærdir menn fáa í lon, tá teir verða settir í embæti her. Hetta eigur ikki at verða sýtt, tí so lítið sum gjort er fyri framburði yvirhovur í Føroyum, omgivm er so lítið gjørt fyri av tí offentligu sum fyri landbúnkinum. Tað hevur tó umframt alt annað gjøgnum aldir borið framhjágjald til ríkiskassan, tað vera nógvir pengar tilsamans, sum farnir eru útav føroyskum jarðabrúki til almannan fremna, meðan jarðabrúkið einki hevur fingið aftur. Nú átti at verið uppá tíðina

at lona okkara álitismonnum í landbrúkinum sámuliga. Eg vil mæla til, at tingið samtykkir, at sakin verður uppaftur tikin næsta ár.

Formaðurin: Ministeriet har i Anledning af den ny Lønningslov ønsket Indstilling fra Amtet bl. a. om Størrelsen af det fremtidige Honorar for Dyrlægen. Herefter vil Spørgsmaalet blive fort frem til Ministeriet med Hensyn til den foreliggende Sag. Jeg kan i Øjeblikket ikke huske, om Ministeriets Forespørgsel ogsaa omfattede Landbrugskonsulentens Honorar, men ifald det ikke skulde være Tilfældet, vil jeg selv bringe det frem for Ministeriet. I Betragtning heraf finder jeg det rimeligt, at Sagen om Lønforhøjelse til Dyrlægen undergaar 3 Behandlinger. Den anden Sag, om Motorbaaden, kan derimod godt afgøres i Dag.

Nyholm Debess: Eg hevði ætlað at seta fram eitt minnitalsforslag, men haldi tað ikki vera neyðugt at úttala meg um tað, nú hasir upplýsingarnir eru frambornir frá formanninum.

J. H. Poulsen: Vit hava tikið okkara stilling í útvalginum útfra tí, at djóralæknin ikki er ansettur. Hatta forhold, formaðurin nú upplýsir um, hevur verið útvalginum ókunnugt, men tað gevur okkum allan ørindning til at uppiaka sakina aftur. Møguligvís vil útvalgið framkoma við einum øðrum forslag.

(Sakin um lønhækkan til djóralæknar fór til 3. viðgerðar.

Í sakini um motorbát til djóralæknar varð nevndaruppskotið samtykt).

Broyting í bygdaskúlaskipanini.

2. viðgerð.

Próstarin: Viðvíkjandi føroyskari rættskrivning er mínistarin sinnaður til at fáa tað í lag, at føroysk rættskrivning verður fast lærugrein í øllum fólkaskúlum í Føroyum. Um spurningin um føroyskt mál skal vera undirvísingarmál hiðan ministeriið tingið um úttalilsi áðrenn nakað verður avgjort. Ministeriið ynskir at fáa nøkur orð frá tinginum um, hvussu tað hugsar sær til, tá føroysk rættskrivning er komin í skúlan og føroyskt mál er vorðið skúlamál, hvussu vit hugsa, at børnini tá kunnu vera før fyri at tala, lesa og skriva danskt. Soleiðis liggur høndan sak fyri á tingi í ár. Vit sum høvdu við sakina at gera ífjør, bóru okkara hugsan framm í tí áliti, vit tá góvu. Her á tingi var ífjør stórur orðadráttur um hetta mál; tí er ónýtt at taka tað upp aftur í ár. Eg og vit aðrir, sum hava haft við hetta mál at gera, hava ikki sbórvegis at leggja aftrat tí, sum var borið framm ífjør. Vit halda, at tað einasta, vit hava at gera, er at svara ministerinum aftur, tá tað spyr, so væl sum tað er gjørligt. Tó skal eg siga tá orð um hesa sak. So sum viðurskiftini eru liva vit við tveimum tungumálum í Føroyum, og tí má uppgávan vera at skipað verður so í skúlunum, at bæði málini lærast. At vit allir vilja læra danskt mál er sjálvsagt. Tað skuldi ikki vera neyðugt at siga tað her inni á Føroya løgtingi. Vit eru ikki blindir fyri tí týdningi, sum danskt mál hevur her hjá okkum í so mongum førum og vit lágmeta ikki virði av donskum máli í Føroyum. Tá talan er um hvør partur av Føroyingum ið er betri ella minni sinnaður fyri donskum máli, so skal eg siga, at vit fyri okkara part eiga fult so nógv yndi og fult so nógva gleði í donskum máli. sum tað, sum aðrir eiga. Annars er tað langt frá mær at meta millum partarnar. Men eingin skal hava rætt at frákenna okkum, at vit ikki hava yndi til danskt mál og lloga at meta, hvat týdning, tað hevur haft og fær fyri okkum. Men tí halda vit eisini, at tað ikki er nokur minkan fyri danskt mál, um vit eisini læra okkara egna mál. So sjálvsagt sum það er, at vit læra danskt, so sjálvsagt er tað, at vit læra føroyskt. Nú er ein spurningur, sum er grundspurningurin: Hvat gagnar undirvísingini best í sínt heild? Hvat er tað amboð, sum lærarnir skulu nýta fyri at fáa tað mest og tað best møguliga úr sínum arbeiði. Her er grundspurningurin fyri øllum skúlaverki, og eisini her hjá okkum. Tí haldi eg, at tað í grundini er undarligt fyri ikki at siga ónatúrligt, at tað skulu verða settar reglur fyri, hvussu undirvísingin skal vera í einum barnaskúla í fólkaskúlanum. Undirvísingarmálið má vera tað málið, sum børnini tala. Nú er

grundarlagið um alla verðina. Og tí vildi eg vera mest sinnaður til at taka § 7 burtur, tað stykki, sum handlar um undirvísingarmálið og lata tað vera fritt sum tað var undan 1912. So at barnið kann nýta tað mál, sum hann sær gagnar hansara arbeiði best. Hetta hevði maer persónliga dámað best. Men § 7 er eina ferð komin uppí. Hon stendur har. Og tí mugu vit handla út frá tí, sum er givið. Og tí er spurningurin komin upp um at fáa hana broytta. Vit hava havt sakina til viðgerð í nevndini, og hava ikki kunna fylgst. Minnihlutarin tekur sína serstøðu. Vit aðrir hava hildið, at tingið má halda fast við tað, sum var samtykt ífjør hesum máli viðvíkjandi. Á tað, sum ministeriið hevur spurt, hava vit sett saman eitt svar, sum vit halda ikki kann vera oðrvísi. Vit halda, at sum viðurskiftini eru, vil tað verða gjorligt við undirvísing í skúlanum at læra barninum danskt mál. Sum § 7 sigur, hevur danskt ein høvuðsseg millum skúlagreinirnar. Og vit hava tað sama. Vit hava danskan rættskriving, danskan stíl og danskt verður lisið. Alla tíðina igjognum hava barnini við danskt mál at gera. Og umframt hetta er tað so, at skúlar okkara arbeiða fyri allan stórsta partin við lærubókum, sum eru skrivaðar á donskum máli. Soleiðis er tað og soleiðis vil tað ivaleyst í langa tíð eisini verða. Nú kann tað sigast, at tit vilja fáa føroyskar lærubókur í skúlan. Tað er satt. Og tað er beint at fáa føroyskar lærubókur. Men sjálvandi, um vit í summum lærugreinum fáa føroyskar lærubókur, so er einki til forðan fyri, at vit eisini við síðuna av kunnu hava danskar lærubókur. Eg kundi hugsa mær, at vit hava rokni-bókur á donskum og rokni-bókur á føroyskum. Á sama hátt: Okkara egnu sogu á okkara máli og Danmarkssogu á donskum máli. Tað er bert heilt náttúrligt. Samaleiðis kundu vit hava føroyska geografi á føroyskum, men Danmarks og onnur lands geografi á donskuh. Eg haldi, at vit allir her kunnu samsinast um, at skúlin arbeiðir við bókum á føroyskum og donskum máli, sum tað kann gerast á besta hátt. Fyri eygablikkið hava vit ikki føroyskar lærubókur til nums, so at hesði nú og í komandi tíð hevur danskt mál eisini sín hovuðsseg í okkara skúlum. Vit halda tí, at tað er møguligt fyri skúlan at læra barnini at lesa, skriva og fatu danskt. Annars má eg siga, at tað er heldur torfort at geva garantiir fyri at hetta og hatta verður gjørt, tað kann løgtingið ikki gera, men til tess hava vit eina skúlaskipan, til tess hava vit forstandarskap, skúlakommissión-ir, inspektión og direktión, allar hesar myndugheitir mega geva garanti og eru tær einastu, ið kunna geva eina sovorðna garanti. Tær mega ansa, at tað í donskum sum í øllum øðrum lærugreinum, ið skulu lærast eftir skúlaskipanini, verður givin tann undirvísing, ið er nevðsynt. Her er komið eitt broytingaruppskot frá nokrum tingmonnum, eg skal einki siga um tað enn, og nú bert mela tingmonnum til at samtykkja tað svar, ið vit, fleirtalið í nevndini, hava borið fram. Eg skal við loyvi formansins lesa tað upp:

1. Lagtinget fastholder det i sidste Sum ling vedtagne Forslag til Ændring af § 7 i Anordning af 16. Januar 1912.
2. Lagtinget mener, at ved den Stilling, som Dansk overhovedet indtager i Folkeskolen paa Færøerne og ved de Hjælpemidler af danske Læsebøger og danske Lærebøger i forskellige Fag, som nu bruges og ogsaa fremdeles vil blive brugte ved Undervisningen, vil Skolen være i Stand til at bibringe Børnene de nødvendige Kundskaber i Dansk.
3. Lagtinget gaar ud fra, at de forskellige Skolemyndigheder til enhver Tid vil passe, at der saavel i Dansk som i alle andre Fag gives en god og forsvarlig Undervisning.

H. C. W.-Tórgarð: Táið hesin spurningur var til umroðu ífjor, varð framsett broytingar uppskot av tveimum tingmonnum, Poul Nielasen og maer. Táið eg nú sum nevndarmaður havi tikið deil í forhandlingunum, havi eg hildið fram, at eg heldi fast við okkara broytingaruppskot frá ífjor, tí eg trúgvi ikki, at vit, utan tað verður fyri skipað á tann hátt, kunnu fáa tann kunnleika í donskum máli, sum eg haldi vera okkum neyðugur. Vit hevdu framsett uppskot um at danskt skuldi vera undirvísingarmál eftir ein vissan aldur ella fyri teim elstu klassum. Í ár vil eg einki uppskot seta fram, men vil bert útfala, at táið skal gerast broyting í teirri núgaldandi forordning, má tað krevjast, at danskt mál verður so mikið nýtt við undirvísingin, sum tað var kraft í okkara uppskoti, við tað, at tað annars ikki kann vantast, at tann kunnleiki, vit Føroyingar eiga at hava til danskt mál, kann haldast viðlíka. Her er framkomið uppskot frá mínum parti, og tað gongur viðari enn mátt, við tað at tað biður tingið framskaffa nevðsynlar upplýsingar um skúlagangin

Føroyum, so harav kann siggjast hvussu moguligheitirnar eru fyri einari góðari undirvísing í donskum. Hetta uppskot vil eg stydja. Prósturin segði, at sakin var nógv umrødd ífjor, og at hann tí ikki vildi siga nógv um hana í ár, men tá haldi eg, at prósturin ikki átti at nomið við tað, id altíð er víst at vilja elva klandur, nendiga hvussu góður ein partur her á tingi er við danskt; tað kann ikki framførast, utan í fylgi við tí kemur pástandurin um, hvussu lítið góður hann sami partur er við føroyskt.

Joen Poulsen: Jeg er enig med Provsten i, at vi bør svare saa vel, som vi kan; men da jeg har læst og senere hørt, det Svar, Udvalget foreslaar, forekommer det mig, at det ikke indeholder rot mange Oplysninger. Ministeriet har spurgt, hvorledes vi kan tænke os, at der bliver en forsvarlig Undervisning i Dansk, naar Færøsk bliver Undervisningssprog. Da Sagen var til 1ste Behandling, udtalte jeg Ønsket om at faa at vide, hvor mange Skoledage der virkelig var ved de forskellige Skoler og hvor mange Børn; jeg ved ikke om Provsten var til Stede, men et andet Udvalgsmedlem var til Stede og lovede disse Oplysninger. De er imidlertid ikke komne. Vi staar paa samme Sted som i Fjor, og vi maa antage, at det, som blev fremholdt i Fjor, at vi ikke kunde faa tilstrækkelig mange Dansktimer, endnu passer. I hvert Fald er endnu ikke andet oplyst. Provsten forsikrede jo, at han og hans Meningsfæller ønskede at lære Dansk. Det har jeg heller aldrig tvivlet paa. Jeg syntes blot, at han brugte et lidt for stærkt Udtryk, da han sagde »vit hava fult so sterkt yndi til danskt máli«; »fult so sterkt«, det maa betyde »mere«, det vilde være nok at sige lige meget; jeg tror, at vi alle vil lære Dansk. — Færøsk som Undervisningssprog kan maaske gaa i en Skole som her i Thorshavn, hvor man har lang Undervisningstid, og Børnene er inddelt i mange Klasser; men paa Bygderne, hvor en Lærer ofte har 4 Skoler, og hvor han maa anvende Tid til at gaa mellem Bygderne, der bliver Skoledagene ikke tilstrækkelig mange. Naar Børn har f. Eks. en eller flere Kilometer til Skolen, da vil der blive mange Dage, hvor i hvert Fald mindre Børn ikke kan naa frem. Provsten udtalte, at han syntes det var mærkeligt, at der overhovedet skulde vedtages noget om Undervisningssproget; det mente vi ogsaa i Fjor, og vi tilbød Forhandling, men vi mærkede ingen Tilslutning. Vi mente, at om der ikke stod noget om Undervisningssproget, kunde man bruge, hvad man vilde, og det vildo være nogenlunde, hvad der nu er Tilfældet, men denne Udvej vilde man ikke tage i Fjor. Vi har tilladt os at rette en Anmodning til Skoledirektionen, om samtidig med Sagen at fremsende til Ministeriet de Oplysninger, vi har ønsket; det var mest ønskeligt, om vi ogsaa havde set de Oplysninger, men det kan jo undværes, naar bare Ministeriet faar dem. Naturligvis vil det hjælpe en Del, at vi har danske Læreboger i Skolerne, det kan hjælpe til at læse det, men ikke til at tale det. Jeg holder for, efter min Erfaring som Lærer, at Dansk maa anvendes som Undervisningssprog, ikke for de mindre Børn, men for de større; det maa afhænge af Klasseforholdene. Man kan anvende Dansk til nogle Ting, Færøsk til andre; man kan let mærke, naar Børnene er med eller ikke. At færøske Børn kan undervises paa Dansk har man Eksempler paa. Vi har haft danske Lærere, der ikke har kunnet Færøsk, og deres Børn har lært godt; men som Føring har det selvfølgelig aldrig faldet mig ind at tale udelukkende Dansk. Jeg skal anbefale Mindretallets Forslag. De to første Punkter har jeg efter Flertallets Stilling ikke noget Haab om bliver vedtaget, men der kan være Haab om, at vi ken enes om i hvert Fald at skaffe de Oplysninger, vi ønsker.

S. P. úr Konoy: Henda sak hevur ligið á løgtingi frá tí degi eg kom inná ting og hvørja ferð, hon hevur verið frammi, havi eg lagt uppí orðaskifti, ikki somikið tí eg væntaði at umvenda forstokkaðar samhandsmenn, men mest fyri at reinska mína egnu samvitsku. Eg vildi ikki, at tað nakrantíð skuldi kunnu sigast, at eg hevði gingið uppá akkord í hesum máli. — Eg vil fyrst venda mær til fyrryverandi skúlalæraran á Strondum, hr. Jógvan Poulsen, sum hevði orðið við 1. viðgerð av sakini, við nakrum orðum. Hesin maðurin hað tá um ymiskar upplýsingar viðvíkjandi fátnatali, skúlaplani, forsømilsum o. t. Eg má spyrja: Hevur maðurin ikki seð eina bók, sum statistisk bureau hevur sent út viðvíkjandi Føroyar? Hann hevur jú m. a. verið sýslumaður, síðani hann vegna heilsubrek og annur meinbrek, fór frá sum skúlalærari, hann má tí hava fingið hetta hefti tilsent. Hur vil hann finna svar. Hvørjar aðrar upplýsingar skal eg geva honum? Hann veit væl, at skúlalærararnir hvørt fjórðingár senda allar teir upplýsingar til direktiónina, sum krevjast kunnu. Teir

skulu senda forsømilsislistar í tveimum eintøkum inn til skúlakommissiónina; annað fer til forstandarskapið, annað til direktiónina. Hesin forsømilsislisti sigur fyrst, hvat tíðarskeið, hann geldur fyri, so sigur hann, hvussu nógv skúlapliktug børn eru í distriktinum, hvussu nógvir dreingir, hvussu nógvar gentur, og fortelur frá, hvussu nógv av teimum, sum ganga í skúla, og greiðir frá, um so skuldi verið, at tey ikki hava gingið í skúla, hví tað er. Harnæst fortelur hann, hvussu nógvar skúlapliktugar dagar, lærarin hevur, harnæst skal lærarin siga, hvussu nógvar dagar hann hevur verið í skúla og hevur hann ikki verið sonógvar dagar í skúla, sum lógin sigur, so skal lærarin siga hví. Tá alt hetta er útfyllt, so skal lærarin uppføra navnið á hvørjum barni, sum hevur verið burt frá skúlanum og faðirs ,móður ella verjans navn; skal siga frá hvussu nógvar dagar barnið hevur verið burt og hvat orsakin hevur verið til tess, um sjúkdómur hevur verið í húsinum, um barnið hevur biðið seg frí og tað hevur verið játtað ella tað hevur tikið sær frí uttan loyvi o. s. fr. Allir hesir upplýsningar liggja til skjals uppi á amtskantórinum og har kann hvør tingmaður siggja teir, um hann vil — eisini Jógvan Poulsen. Tí tað er væl ikki hansara meining, at útvalgið skal útarbeiða eitt stort statistisk verk hesum viðvíkjandi? Tað man vera ónýtt — slíkt gera teir so nógv betur í statistisk bureau.

Tað er nakað annað, eg kundi tonkt mær, tingmaðurin av Strondum kravdi framlagt, umframt tær offentligu innberettningarnar. Sum hann veit, eru bygdaskularnir undirgivnir eina inspektión, sum bestendur av 1) tveimum inspektorum úr Havn, 2) skúlakommissióni við oksamen og innberettningi frá prestinum, og 3) ti stikkprova, sum ministeriið hevur fyriskrivað, skal fyritakast hvort ár í einum ella teimum fakunt. Tað materiali hevur hegartil ikki verið tilgongiligt. Men tingmaðurin av Strondum er eisini vitandi um, at í tí villastu sambandstíðini var ein annar inspektión: formaðurin í skúlastjórnini saman við sambands-fólkatingsmannunum, sum sigldu runt um oyarnar og upptók forhoyr í ymsum skúlum. Um nakað materiali fyriliggur frá hesari inspektión er mær ókunnugt, men tað má væl finnast onkunnstaðni. Henda inspektiónin fann tó ikki stað fyri allar skúlar. Meðan »Beskytteren« dundraði innfyri boðarnar í Leirvík kom hann ongantíð, mær kunnugt, inn fyri Strendur — hví, vait og ikki. Um tingmaðurin á Strondum og sambandsmenn við honum yvirskja alt hetta, tær fortróligu innberettningarnar til direktiónina eins og tað møguliga materiali fra sambandsinnspektiónini lagt opið fram á tingborðið, so skal eg kanska einki hava ímóti tí. Vit vita tó tað, at tátíð sambandið ráddi var hetta heldomt noktað og privat hevur tingmaðurin av Strondum so mangan útlalað yvirfyri mær, at hann ikki meinti, tað var hóskandi at leggja hesar innberettningar um feir einkultu lærarar opinberliga fraum. Tað er eisini sín sak at leggja alt slíkt, sum ofta er av nógso privatari natúr, fram til offentligan kritikk. Persónuliga havi eg ikki stórt álit á einum dómi frá einum manni, sum ½ tíma hevur verið í skúhanum og hvørt, hvat børnini duga.

Nú kemur broytingar uppskot frá uttinitalinum, sum krevur, at alt materiali um skúlaforsømilsir, barnatalið, lærarakreftur, skúlaplan o. s. fr. skal sendast til ministeriið! Sum um hesir menn meina, at ministeriið ikki hevur atgongd til alt hetta, — ella meina teir kanska, at skúlarnir eru komnir í eitt sovorðið ólag, síðani sjálvstýrismenn tóku við, at hetta er blivið neyðugt? Sovítt mær kunnugt, hava forstandarskapir, skúlakommissión og direktión uppfyllt sínar pliktar. Skúlaforsømilsini eru ikki blivin stórri, skúlabørnini hava nøtt og lærarnir við. Eg má siga tað hevur undrað meg stórliga, so fá skúlaforsømilsir hava verið; sjálvt harheima hjá mær í Gøtu, hvar børn fáa 50 øvr um tíman í arbeiðslon, havi eg ikki konstaterað fleiri forsømilsir enn vant. Og tað er tó ein stór freysting fyri børnini — skúlamillktin er bara 10 øvr. Hvat er tað tá formaðurin fyri sambandspartinum sigur til ráið hann sigur, at tað fyrikemur honum, at tað ónormala er blivið normalt; hvat er tað, sum býr undir øllum hesum?

Tað sýnist meir og meira sjónligt, at alt gongur út uppá hetta eina: Uppfylla lærararnir tann anda, sum sambandsmenn meina, at lógin fyriskrivar? Eg vil gjarna spyrja orðførara sambandsmannsins: Hevur hin føroyski fólkaskúlin borið ta eina uppgávu at læra børnini danskt mál? Eru eingi onnur fak í fólkaskúlanum? Eg havi forstaðið tað so, at vit lærarar hava til plikt at læra líkavæl føroyskt sum danskt, líkavæl religión sum rokning o. s. fr. Men nú er høvuðsspurningurin ein: Læra børnini *danskt*? Er tað so, so sigið teir við klárum orðum, at alt skal resultera í generalnevnaranum: *d a n s k t!* Og visstað er so, so vil eg spyrja: Sker lutta eftir ynski frá ansvarligum persónum í Danmark, er tað í kontakt við menn, sum standa frammi í

offentligum lívi í Danmark? Eg veit væl, at menn, sum hava lut á sambandsmegni í diskussiónini um Føroyar, hava verið sterkt frammi í 3. Zoom, harðliga átalaðir av ministaranum H. P. Hansen. Er tað teirra mening at fordanska okkum? Og, má eg spyrja, hvat gagn hevur Danmark av at fordanska okkum? Eg havi livað í ti fatan trúgv, at Danmark ikki vildi okkum til lívs nationalt sæð — havi eg kannska sæð skeivt?

Men tað mugn tingmenn Føroya fólks eins og Danir vita, at í barnaskúlamum er einans eitt undirvísingarmál pedagogisk forsvarligt: at lærarin talar sama mál sum tað, børnini tala. Hetta er grundin undir allari pedagogikk, alt annað er ótilbørligt.

Annans haldi eg tað, at Danskarar áðan at sæð við takksemi til okkum og áttu at farið eitt sindur varliga við Føroyingum. Her er tó ein fólkaflokkur, sum frívilluga vil læra teirra tungumál, ein fólkaflokkur, sum liggur uppat tí størsta málsamfundi í heiminum. Taka vit bara nyttuhensýn, so er eyðvitað, at vit áttu at lært eingilsk — um tað hevði verið til gagn fyri Føroyingar, skal eg ikki siga, men er tað til gagn fyri Danmark? At fara ov agressivt framm í hesum er eitt tvíeggjað sverð. Ongantíð hevur nationalkenslan vaksið sog so sterka í Føroyum sum í teirri tíð tá § 7 var smíðað. Tað er og vil altíð verða so, tá ein rørir við hesa kensla; um nakar vágar at tippa, so má eintin ventilurin av dampketlinum ella rýkur tað heila í luftina.

Eg ætli mær í mínum skúlayrki enn sum áður at fylgja teirri kongaligu anordningini og geva hvørjum máli sín rætt utan fyriskrivaðum reglum um, mær eg skal læra danskt og mær føroyskt. Eg gangi útfrá, at vit lærarar eru menn við samvitsku og vilja nýta hana sum rættisnór.

Til Tórgarð vil eg siga, at lunsara atburður hevur forharmað meg. Vit hava sitið 2 ár saman í kirkjukassanevndini og behandlað hesa spurning og báðir vóru vit á einum máli um, at hann var týdningarmikil, at hann hevði elvt og kom at elva nógvan ordadrátt, og at tað tí ráddi um at kunna sameinast. Eg hevði tað imtrykk av Tórgarði, at hann ikki stó langt frá tí stoðu, har eg stó; og visti, at hann hevði studið frammi í tingmannafelaginum og í øllum lutum ynskti okkara máli at vinna ta stoðu, tað natúrliga átti. Fyrst ífjør uppdagaði eg, at maðurin ikki var samsinnur við mær. Tað ger mær ilt, at man fyrst skrivar undir við forbehold og seinni stillar eitt broytingar uppskot. Antin má hann ella eg hava skift stoðu í hesum máli. Vit hava havt hesa sak til viðgerð altur í ár, og hann hevur givið eitt minnitalsuppskot eitt sindur framm um broytingaruppskotið ífjor. Og nú hevur hann við sínum nomnum skrivað undir nakað, sum gongur enn longur. Her er soleiðis ein útviklingslinja framm eftir. Men tað er jú einki at tala um. Tó vildi tað vera gott, um eg, meðan vit sita í nevndini, kundi vita støðuna hjá einum manni, sum eg siti og arbeiði saman við — vita hansara støðu áðrenn tingið er sett. Tað hevur verið so nógv havt á máli um kærleika. Mær dámar ikki at standa á tingi og tala um kærleika. Hann havi eg fyri meg sjálvan. Men fyri mær er Føroyar *mítt* land og føroyskt *mítt* mál, og út frá hesum dømi eg. Her á tingi tala tveir menn danskt. Kannske man av hesum vil bevísa, at danskt er talumál í Føroyum. Men tað er ikki. Føroyskt er talumál ber í oyggjunum.

J. Poulsen: Den sidste Taler var saa hensynsfuld at vise hen til, at jeg paa Grund af Sygdom har været nødt til at fratræde mit Embede. Dernæst omtalte han, at en Amtmand har rejst om til Skolerne og ikke været for streng. Amtmanden kom til Strander efter Skoletiden. Og da man samme Dag var ude for at hente Slagtefaarene, saa var alle Skoledrengene gaaet den Vej. Men om det var min Agt at give Amtmanden et godt Indtryk af Skolerne, saa kunde jeg have gjort det. For der var den Dag en Del flinke Piger til Stede. Om jeg havde sendt Bud til dem, saa havde Amtmanden faaet et Indtryk af Skolen, men det vilde jeg ikke.

S. P. úr Konoy: Eg havi einans konstatera, at maðurin hevur verið skúlalærari; at hann fór frá og bleiv sýslumaður, einki annað. Viðvíkjandi amtmann Rytters besøk og at dreingirnir vóru á fjalli, kann sigast, at tað á Strondum eru fleiri hagapartar, so at allir dreingirnir hava vist ikki verið á fjalli. At man ikki vil geva amtmanninum falskt imtrykk av skúlanum, er prís vert. Men Rytter var fúsur at ferðast. Hví kom hann ikki aftur inn á Strendur?

H. H.-Tórgarð: Aftaná at Konoy hevur hildið eitt fyri hann betekmandi fyridrag um ein annan tinglim, J. Poulsen, gevur hann í sámiligari tónu eina frágreiðing yvir sín útvikling. Eg lati tað standa fyri hansara rokning. Eg dugi ikki at siggja,

at tað, sum eg havi gjørt í hesum máli, er í stríð við nakað annað, sum eg havi gjørt. Hann tekur til, at eg var limur av einum felag; men skal tað vera bestemmandi fyri mína støðu í politikk. Eg eri í bestýrilsinum fyri einum felag, sum hevur til programm eina almenna menning av ungdóminum. Men tað er væl ikki bestemmandi fyri mína støðu í føroyskum politikki. Eg vil annars ikki nerta við nakað annað, sum Konov segði, tí so fái eg væl frá honum eitt av hansara vanligu fyridrogum um, hvør tí mentaður er her á tingi. Men tá Konov vil blanda saman danska og føroyska politikk, so er mítt forhold ikki betingað av danskari politikk.

S. P. úr Konoy: Eg segði, at Tórgarð hevði skrivað broytingar uppskot aftaná at hann hevði sitið í nevnd saman við okkum. Nú er hann illur um, at eg havi sagt tað. Men tað gerst ikki við. Í hvørji tónu, eg tali á tingi, má eg ráða fyri. Tórgarð talar jú í síni tónu. Men hann skuldi vera ldárur yvir tað, at fyri teir, sum sita í eini nevnd er tað betri at vita hansara støðu tá, enn seinni, tá sakin kemur fram til tings.

Prósturin: J. Poulsen undrast á, at eg havi sagt, at eg var hugaður til at hala § 7 um undirvísingarmálið fella burtur. Og hann vildi spyrja um, hví vit ikki bóru eitt uppskot um tað framm ífjør. Hartil er fyrst at siga, at hetta stóð ikki í anordningini av fyrstan tíð. Hetta er nakað, sum tað táverandi fleirtalið setti í 1912. Eg kundi tí siga, bví settu teir tað inn. Vit máttu rokna við tí, sum var fyri. Eg vil retta tann spurning til Joen Poulsen, um hann vil vera við at strika alt tað í § 7, sum stendur um undirvísingarmálið? Um hann vil vera við at lata hesa § vera sum hon var undan 1912, so skal og eisini vera við til tað. Í broytingaruppskotinum, sum er komið fram, stendur, at tað skal sendast frágreiðing til ministeriið um skúlaviðurskiltini í Føroyum um, hvussu margir lærarar, hvussu mong børn, hvussu margar lærugreinir, og so framm eftir eru í hvørjum skúla. Hetta er heilt ónevðugt, tí ministeriið veit alt hetta. Tí tað stendur í § 8 skilað til, hvussu tað skal vera við øllum hesum: at tað skal útarbeiðast ein skúlaplánur um skúlatíð, um lærugrein, um fakini, børnini, býting í tímatal o. s. fr. e. Tann plaunr, ið soleiðis verður samtyktur, verður útarbeiddur í tveimum eintokum: av teimum fær ministeriið annað, so ministeriið má vita alt, hvat verður borið fram av hesum. Mín tíð í skúlastýrinum hevir verið ógvuliga stutt og vit hava ikki haft nakran plan til avgjørslu har í teirri tíð, men sum formaður í skúlakommissiónum í Súðurstreymoy havi eg verið við til at útarbeiða ymissar planar og senda teir til skúlastýrið.

A. Samuelsen: Sum vit allir vita er hetta ein sak, ið vit ofta hava haft fyri her á tingi, og navnliga høvdu vit hana rætt inngangandi til behandling ífjør. Eg havi verið við til at undirskriva broytingaruppskotið og sluttí med fult út til, hvat okkara orðførari segði, men eg vil fyri mag sjálvan eisini siga eitt sindur. Hendan sak hevir vakt nógv uppsikt í Føroyum, líka væl sum í øllum kongadømunum, og tað er ikki so merkiligt, við tað, at vit nú skulu venda um frá tí, ið hevir verið, og í staðin fyri danskt sum undirvísingarmál hava føroyskt. Hetta hevir í Føroyum vakt pínliga uppsikt nógva staðni, ið hvussu er, í teim plássum, hvar eg eri kendur. Eg skal ikki tosa so nógv um, hvat uppsikt hetta hevir vakt niðri í kongadømunum, men tað er um alt landið. Um kirkjuministeriið hevði svarað soleiðis, at man ikki var villugur til at broyta annað enn tað, at føroyskt herefter skal kunna lærast at skriva í skúlum okkara, so hevði hetta óivað vakt játtilsi í Føroyum. Nú hava teir svarað øðrvísi. Men ádrenn ministeriið vil taka stilling til hetta spursmál vil tað hava upplýsing og begrundilsi frá skúlastýrinum. Tað er rett nokk sum prósturin nú segði, at teir planar, ið verða gjørdir, skulu innsendast til ministeriið, men teir eru sendir har til forskelliga tíð og so er tað ikki so handligt fyri ministeriið at fáa fatur á teir. Tað seinasta skúlastýrið hevir óivað sent allar plánar niður, sum tað hevir verið pliktugt til, um tað núverandi skúlastýrið eisini hevir gjort tað, veit eg ikki. Men undirvísingarplánarnir innihalda ikki allar tær upplýsingar, sum endringsforslagið ynskir, ministeriið skal fáa, so tað er ikki heilt beint, hvat prósturin segði. Annars vildi eg ynskt, at vit vildu gjørt krav uppá at fáa at vita, hvat er gjort við hesa sak síðani hon var her seinast. Nú kann tað vera, at fleirtalið sigir, at teir vita, hvat skúlastýrið hevir úttalað um hetta og hvat tað meinar, men vit aðrir, ið ikki kunnu rúmast í kirkjukussaútvalginum (har kunna bert 3 vera), vit vita einki. Kanska er tað skúlastýrið, ið er skyld í, at hetta er komið aftur, um so er, vildi eg takka direktiónini, um eg enn vildi lagt nakað aftrat, tí eg veit, at í hvussu er tveir limir

av direktiónini hava ein stilling til danskt, sum mær ikki dámar. Eg siggi, at direktiónin heldur møti nú í eygablikkinum, og eg vil biðja hana lata okkum siggja, hvat teir hava skrivað um hesa sak, síðani hon var her seinast. Hetta er ein ógvuliga betýðilig sak, ikki bert tí Føroyingar leggja stóra vekt á hana, men eisini tí hon vil koma at hava stórt inntlydelsi uppá framtíðini hjá okkum. Eisini í hesari sak eru vit, sum studentarnir siga, í teirra nakað viðgitna skrivilsi, í eina royndarstund, og her ræður um, at konsulsernir annar sær fyri, at her ikki verður gjørt nakað, ið verður fólkinum at skaða; eg vil leggja aftrat: af hana! Eg eri forharmaður um, at mann ífjør reisti hendu spurning, tá ið hann einaferð reistur sleppa vit ikki so lætt av við hann. Eg vildi funnið tað í sín ordan at taka hetta framm, táið »Tidens Fylde« kom mon eg eri forharmaður um at mann er komin framm við hesum spurningi, sum mann var sikkur í vildi býta sundur í Føroyum og ikki samla í einari stund, tá tað framm um alt ræður um at samla. Nú er hann reistur, og hann vil skilja sundur, og tað vil vara mong úr, áðrenn hann verður loystur, hesin spurningur; hann vil elva stríð til bágs fyri nógvar aðrar sakir, ið krevja at verða loystar Tann anordning, vit hava, hevir eina paragraph 7, ið er so lagalig og rúmlig, sum tað kann forlangast Eg rokni, sum tingmaðurin úr Gotu, altíð við, at lærarar hava samvitsku, og og forstandi ikki, at mann av tí paragraph ikki kann fáa tað best moguliga út fyri okkara skúla Um tað er so, at vit skulu læra danskt mál, sum jú eisini sjálvstýrismenn vilja, siggi eg ikki annað, enn at handa paragraphen er nødvendug. Nú er eisini so, at tær flestu okkara skúlabøkur eru á donskum, so sjálvt um eg var sjálvstýrismaður og vildi hava føroyskt undirvísingarmál eina ferð í tíðini, vildi eg sligið nøg til fols við hesari paragraph í eygablikkinum. Eg biði sjálvstýrismenn fyrigeva mær, at eg ikki dugi at siggja nakrari onn, at tá teir hava reist hesa spurningin, so er tað fyri at halda lív í einum rabaldurmunnmari. Ja, eg vnski at siga, sum eg meinti - - eisini í tí eri eg ólíkur sjálvstýrismonnunum, at eg ikki havi nakað aftanfyri míni orð. Eftir at hava smakkað hetta rabaldurmunnmari frá ífjør, noydast teir fyri skonunis skyld at halda lív í tí fár; tað hava teir meint ikki at kunna lata vera, men eg hopi nærmast sjálvstýrismenn frá hugsa sum so: Best mann vera sum er! Vit hava lagað okkara rabaldurmunnmar, tað bleiv heldigvís ikki gjøgnumført, - - best mann vera sum er! Í virkuligheitini eru teir so himmalgladir yvir, at ministeriið ikki hevur statfestað teirra uppskot.

Eg má halda fast við, at tað hevði verið ógvitiga heut, um vit fingu at siggja skúladirektiónins skrivilsi um hesa sak. Viss vit ikki kunnu fáa tað at siggja, so noydist eg at fyristilla mær, hvussu teir hava stillað seg.

Eftir at hava framsett hesi otvey orð, sum prústin sigur — hann skuldi bara tosa »tvey orð«, og so tosaði hann hálvan annan tíma (eg havi jú ikki tosað so leingi), vil eg ganga yvir til at behandla hvat hinir limirnir hava sagt. Tað bleiv jú nógv tósað um sakina ífjør, men tað kann ikki hjálpa — vit skulu bliva við at tosa.

Prústin segði, at allir sjálvstýrismenn vóru fegnir við at læra danskt mál, ja, hann segði eintá meir: at sjálvstýrismenn hevdu fult so nógv vndi til danskt mál og dugdu fullt so væl at gloða seg yvir tað, sum vit ádrir. Eg má siga, at eg vildi fegin trú, at hetta var sannheit, men eg eri forharmaður um, at tað skal vísa seg neydvendugt hjá sjálvstýrismonnum at framseta hesa forsikring ferð eftir ferð, tí teirra egna uppskot talar sterkt móti tí. Teir hekrefta við munninum, at teir fegin vilja læra danskt, men uppskotið frá sjálvstýrispartinum ger tað eftir mínari meining ómogutligt fyri okkara born at læra tað. Hvør hjálpir tað einki, hvat sjálvstýrismenn vilja, tá nógvir lærarar og eisini ádrir menn halda tað, sum viðtikið var ífjar, gera tað so gott sum ómogutligt fyri føroysk born at læra danskt mál. Vit vita jú tað, at tann stóri parturin av Føroyingum ikki fær annan undirvísning enn tann í fólkaskúlanum; tað ern ikki allir, sum kunnu hlíva prústar og skúladirektorar. Sjálvfylgiliga duga hesir menninir danskt, men teir kunnu ikki forlanga tað sama av hvørjum Føroyingi. Eg gangi útfrá, at prústin dugir bedri danskt enn Føroyingar yvirhovur, og skúladirektorurin í Gotu við, sjálvtum teir ikki eru farir fyri at læra onnur tað, men bortinni hjá tí almindiliga Føroyinginum. Hjá útiróðrarmannanum í Føroyum, hvussu skulu tey læra danskt? Tað er ómogutligt fyri ein almindiligan føroyskan útiróðrarmann at geva børnum sínum annan undirvísning enn tann, tey kunnu fáa í fólkaskúlanum. Natúrligvís kunnu tey hava atgongd til at koma á háskúlan á Frælsinum, men har læra tey ikki nógv danskt, tað vita vit. Viss sjálvstýrismenn fáa hetta gjøgnumført, so kunnu teir nokk siga, hvat teir

vilja, men so hava teir gjort tað, at hin almindiligi Føroyingurin, útróðrar- og traðarmaðurin í Føroyum ikki kann læra danskt mál.

At úttala seg um við hvørjum fólksum, ein umfatar danskt mál, er jú nakað vanskuligt. Tað hevur ofta verið sagt, at vit sambandsmenn hava einki til yvirs fyri føroyskum. Tað er ein falskur dómur. Eg noydist at sláa fast, at viss sjálvstýrismenn fáa teirra vilja fram, so er teirra kærleiki til danskt mál bara at finna í munninum, tí nakað kenskap til málið fær okkara fólk tá ikki. Munurin millum teirra og okkara støðu er framstillaður sum eitt »Æntin—ellale, sentin føroyskt ella danskt. Tað haldi eg ikki. Fyrisovitt vil halda uppá tað, sum sambandsspartíið fyrisigur, so vilja Føroyingar læra bæði málini. Vit ynskja at børnini skulu læra føroyskt væl á somu tíð sum tey læra danskt væl. Her hava vit ivaleyst rætt, og eg hugsi nokk, tað verður sagt, at vera rætt av flestu av Føroyingum, tí tað vil vera okkara fólki sárt, um vit skulu missa annað málið. Gongur man fram, sum vit meina, so missa vit einki, gongur man harímóti fram sum sjálvstýrismenn vilja, so missa Føroyingar danskt.

Soleiðis sum forholdini eru, sigur prógstin, vildi hann gingið við til at skilja út, hvat ið vera skal undirvísningsmál. Nettupp sum statt er, haldi eg tað vera galið ikki at hava bestemtar reglur fyri hvat undirvísningsmálið er. Tá vit í sínari tíð settu upp sovorðnar reglur, var tað gjørt, tí ein maður reisti henda spurningin og hesin maður æt Jákup Dahl. Hann var lærari tá, og hann gav anleiðning til, at man fór at beskeftiga seg við undirvísningsmálið, og at man viðtók eitt úttalilsi til ministeriið, sum so var sett inn í skúlaanordningin av 1912. Eg vil takka honum, at hann gav anleiðning til, at vit fingu fastsligið, hvat undirvísningsmálið skal vera, sjálvt um hann nú ynskir hetta ógjort. Eg vil ikki vera við til at lata § 7 ganga út; jú oftari eg lesi hana, jú meiri komi eg uppá tað reina við at henda § er fullstendiga meisterliga samansett. Eg kann ikki teinkja mær eina paragraf meira meistarliga, helst tá vit rokna við at tað eru lærarar við samvitsku, sum skulu brúka hana. Eg vildi ynskt, vit kundu latið § 7 verið óbroytta enn eina tíð: lat okkum so siggja um eini 10 ár, um hon tá ikki hevur virkað so, at sjálvt sjálvstýrismenn mugu erkenna, at tað kundi ikki verið betri. Nakað betri kunnu teir ikki gera fyri okkara land enn at geva avkall á tað uppskot, teir hava stillað. Eg vil biðja teir um tað. Konoy talaði um skúlainnspektiónina. Eg havi tann fatan, at nevndin skuldi savnla upplýsingarnar. Teir siga, at hesir upplýsingar kunnu fáast á amtskontórinum. Tað hevur annars verið góður tingsiður, at teir upplýsingar, sum eru neyðugir fyri eina sak, finnast í sakini sjálvari. Og tá tað er so lætt sum her, bert at taka eina handbók fram, so fati eg ikki, hví man ikki hevur gjørt tað. Tað ber ikki so vel til at senda eina handbók við til ministaran. So talar Konoy um Beskyttaran, sum dampaði til Tvørvíkar. Eg var við har. Og og var við til inspektiónina í Gotu. Eg veit, at Tvørvíkingar ikki óttaðust fyri Beskyttaranum. Og tann inspektiónin, sum í Gotu fann stað, var ógviliga mild. Tað var í virkuligheitini ein vitjan og læraramir óttust at verða feginir yvir, at skúladirektiónin kom at vitja teir og teirra skúla. So talaði skúladirektørurin um, at Beskyttarin dampaði ikki til Strandar. Eg haldi, at soleiðis sum hetta varð frammsett av Konoy, var tað ógviliga illa orðið. Viðurskiftini vóru so, at tveir skúladirektorar komu til Strandar aftaná skúlatíð, og tað vísti seg at vera vanskiligt at samla børnini, eisini av tí, at har er langt millum húsa. So kundi mann siga, at so kundi skúladirektiónin fara aftur hagar. Men tað er væl eitt reint tilfeldi, at skúladirektiónin ikki hevur verið aftur har. Strandingar hava eins góðan skúlakumleika, sum aðrir Føroyingar. So tað var vist ikki tí, at skúladirektiónin ikki fór aftur til Strandar, at hon skuldi vera bangin fyri at uppliga nakað har meiri enn aðrastaðnis. Skúladirektiónin fór til hetta verk við tí góða vilja at gera nakað gott. Tað gleðir mig at hoyra tann valda skúladirektorin siga, at tann skúladirektiónin, sum nú er, ber seg at á sama máta sum tann fyrra. Tí so er, so er tað domi um, at tann skúladirektiónin, sum var frammanundan hevur verið sum ein skúladirektión skal vera. So úttalar Konoy: Hvat gagnar tað Danmark, at vit læra danskt her í Føroyum? Nú fer hann skeivur. Tá vit kompa fyri at hevara danskt í okkara skúlum, so er tað ikki av hensyn til Danmark, men til okkum sjálvar. Vit ganga út frá, at føroysk skúlaborn kunnu ikki undvera danskt. Við at senda upplýsingarnar vilja vit vísa ministeriinum, hvussu nógva tíð føroysk børn hava til at læra alt tað, sum vit krevja av teimum. Hetta er neyðugt fyri at ministarin kann doma um, hvussu føroysk børn kunnu læra at tala, skriva og lesa danskt, tá tað verður

gjøgnumført, sum fleirtalið ífjør forlangar gjøgnumført. Eg haldi, at ministarin ikki er fult yvirbevístur um, at tað sum fleirtalið setti ífjør, kann útførast í praksis. Hann heldur tað víst vera ógjørligt, tá mann ikki hevur fleiri lærarar enn nú. Tað ræður so um hjá fleirtalinum at bevísa, at tað er tíð til tað, meðan vit ætla okkum at bevísa, at tað ikki er tíð til tað. Ministeriið kann ikki dørna um hotta fyrr enn tað hevur allar upplýsingar, sum hoyra til. Tað er so, at man kundi teinkja sær, at ministeriið segði: Javel, vit vilja ganga inn uppá hetta, men so mugu tit eisini fáa fleiri lærarar, ialfall ein lærara til hvørja bygd, um børnini skulu læra at tala, skriva og lesa danskt, sum væl er ein forútseting eisini hjá fleirtalinum. Og ministarin hevur rætt at ganga út frá, at eisini sjálvstýrismenn vilja at føroysk børn skulu kunna lesa, skriva og tala danskt — ikki einans tey ógviliga begávaðu børnini, men tey almindiliga begávaðu børnini eisini. So helt Konoy, at tað var skeivt at fyriskriva undirvísingarmálið. Tað kann Konoy ikki meina. Hann meinar, at tað er skeivt, at danskt skal vera undirvísingarmálið. Hatta noyðist hann at revidera, tí ífjør hevði hann uppskot frammi í mótsettan rætning. Hr. Konoy kom inn uppá hvat kærleika tey forskelligu parti hava til málið. Ja, hr. Konoy sigir sjálvur, at hann elskar danskt mál og danskan litteratur, og tað ivist eg ikki í, at hann elskar sín Brandes og Schandorph o. s. fr., men og má kortini siga: Ja, tað er undarligt smed den Elskene, tí hann elskar málið og kortini vil hann týna tað burtur úr skúlanum, og tað er jú har, tað skal lærast. Tað er kannska tí hann elskar tað, at hann vil hava tað burtur úr skúlanum, tí vit kannska hava tosað tað nakað ljótt og skrivað tað nakað ljótt. Men skúlalærarin í Gøtu skrivar heldur ikki fejlfrítt danskt, tað hava vit sæð her á tingi, og táið hann og og tala danskt, er tað við føroyskum accenti. — Eg vil siga fyri meg: eg eri fegin við, at tað kann hoyrast á mínari talu, at menn kunnu siga: hasin danskarin er slektaður úr Føroyum. Konoy segði, at hvørja ferð her hevir verið stemmað um føroyskt mál, hava sambandsmenn stemmað soleiðis, at man skuldi trúð, teir ikki unti okkara máli væl. Vit stemmaðu ífjør fyri føroyskum sum lærugrein, men høvdu vit ikki stemmað fyri tí, hevði vist svarið frá ministeriinum sæð ørðvísi út enn nú, tí høvdu vit ikki stemmað fyri, hevði ministeriið væl ikki viljað framt tí. Eg var boteinkiligur við tað í fjør, ikki tí eg ikki unni okkara máli val, men tí vit vita, at vit hava nógvar lærarar, ið ikki eru førir fyri at undirvísa í skriftligum føroyskum, tí teir hava ikki sjálvir lært tað. Eg spurdi próstin í fjør, um lærararnir kundu undirvísa herí, og hann svaraði ja, og so segði eg, táið prósturin vil standa inni fyri, at børnini læra at skriva føroyskt, havi eg einki ímóti tí. Konoy segði, at niðri í Danmark tráðu menn, at her í Føroyum talar man danskt sín ámillum. Eg vil spyrja Konoy, í hvørjum bløðum, tað hevir staðið, olla hvør ið hevir sagt tað; eg havi verið víða um í Danmark og havi talað eisini um okkara skúlaviðurskifti, og og havi altíð hildið fram, at okkara talumál, tað er føroyskt. Eg havi verið í Danmark í tveir vetur, og í teirri tíðini havi eg lisið so gott sum øll donsk bløð, ið hvussu er hugt tey íggjognum, men eg havi einki funnið herum. Konoy segði, at donsk bløð høvdu skrivað hetta; eg vil biðja hann novna helst 2 bløð, men tað man vera so, at hann ikki kann nevna bara 1. Eg havi nú sagt hesi tvey orð, fyri at brúka próstsins orð, men tað kann jú vera, at eg komi at taka orðið aftur seinni; hetta er jú ein so ómetuliga viktug sak, sum vit ikki kunnu leggja ov nógva vekt uppá. Vit eru í einari royndarstund, lat okkum ansa okkum fyri at gera nakað, sum antin vit ella fólkið, sum vit reprensentera, kunna at angra. Eg trúgvi vit vilja standa okkum við at bíða.

O. Effersøe: Provsten begyndte med at sige, at han med Hensyn til denne Sag vilde indskrænke sig til, hvad han fremførte i Fjor. Han kom saa med en lang Udvikling, der udæskede til Diskussion, og derfor tillader jeg mig ogsaa at fremføre nogle Bemærkninger om denne vigtige Sag. Provsten fremhævede, at der var Enighed om at indføre skriftlig Færøsk som Fag i Skolen. Til at begynde med var det jo saaledes, at der ingen Stemning var for dette i Folket: man maatte skabe en Stemning, men ogsaa samtidig skaffe Lærerkræfter. Naar disse er tilvejebragt, kan man gaa til Indførelsen af skriftlig Færøsk som Fag. Hvorvidt dette Tidspunkt allerede er inde, er ikke helt godt at sige; det er vist ikke alle Lærerne, der er fuldt ud skikkede til at undervise i dette Fag; det maa saa gaa som det kan, efterhaanden bliver det jo godt. Hvad angaar det danske Sproga Stilling i Skolen, ønsker vi en nøje Drøftelse deraf. Med Hensyn til vor Stilling kan der ingen Tvivl være om, at vi ønsker, at Børnene faar alt, hvad

do trænger til. Men man kan heller ikke tro, at naar Selvstyrepartiet fremsætter en Paastand, at de saa ikke mener noget med den. Dog, her vil jeg minde om den Betænkning, der fremkom i 1912, hvori Dansk fremstilles som et fremmed Sprog, som man vel vil lade foreløbig forblive i Skolen, men hele denne Fremstilling er ikke af en saadan Art, at man kan tro, at man vil lade Dansk faa en passende Stilling i Skolen. Selv om man ikke er Skolemand, maa man kunne slutte saa meget, at med det Antal Lærere og med den Tid, der er til Raadighed til de enkelte Fag, undrer det mig, at man overhovedet kan opstille den Tanke, at Dansk uden at blive Undervisningssprog kan læres tilstrækkelig godt i Skolen uden at det gaar ud over de andre nødvendige Fag. Provsten sagde, at dette burde ordnes, som det gavnede Sagen bedst, jeg vilde fremstille det saaledes, at dette bør ordnes saaledes, som det gavner Folket bedst. Provstens Stilling er paa dette Omraade rent doktrinær; han er ikke i Stand til at se naturligt paa Sagen, saaledes som Virkeligheden nu engang er. Og den bekræfter, at det vil være umuligt at lære Børnene Dansk, naar det ikke er Undervisningssprog. Det kan slet ikke nytte, at han vil trøste os med, at Lærebøgerne er danske. Det er jo netop, hvad han og hans Partifæller tilsigter, at alle Hjælpemidler skal være færøske, og det faar de saamaand nok gennemført, saa den Trøst batter ikke stort. Provsten gør sig desuden skyldig i Selvmodsigelser. Han udtaler, at selvfølgelig burde Undervisningssproget være Færøsk, og det er jo det, han vil have fastslaaet ved Lov samtidig med, at han siger, at han vilde ønske, at det overlodes til Lærerne selv at afgøre, om de vil benytte Færøsk eller Dansk. Nej, skal Undervisningssproget være Færøsk, saa er det os, der bestemmer, at de skal undervise paa Færøsk.

Ministeriets Forespørgsel til Lagtinget opfatter jeg saaledes, at de dernede er blevne forbløffede og spørger: Mener I virkelig det? Jeg synes ikke, vi kunde vente andet, og nu maa vi give Ministeriet nærmere Besked. Derfor er der fra vor Side fremsat Ændringsforslag. Vi ønsker, at der gennem de Oplysninger, Direktionen kan give, fremkommer et levende Billede af, hvorledes Skoleforholdene er hos os. Vi maa give saa nøje Besked som muligt, saa at Ministeren og hans Embedsmænd kan sætte sig ned, tage Kortet frem og gaa efter med Passeren. Saa vil de snart blive klar over, hvor Landet ligger.

Provsten erklærer højtidelig, at han har en ren Samvittighed, og Hr. Konoy taler om at rense sin Samvittighed. Hvorfor dog bedyre sin rene Samvittighed, naar den er saa ren! Naar d'Hrr. siger, at den er i Orden, saa vil jeg selvfølgelig ikke benægte det, men i Stedet for al denne Bedyren vilde jeg have sat Pris paa, at d'Hrr. havde fremsat Forslag om, at Dansk maatte faa den Stilling, der tilkommer det. Saa siger Provsten, at Selvstyremænd har større Kærlighed — syndis til Dansk end vi andre! Det er dog virkelig for galt, det er at vende op og ned paa det hele. Lad os dog ikke se det, at Selvstyremændene, som har villet have Privilegium paa at holde af Færøsk, at de ogsaa vil hævde Privilegium paa Kærlighed til Dansk. Det vilde være overmaade rigeligt, om de havde nøjedes med at sige, at de havde ligesaa stor Kærlighed til Dansk som vi andre. Men den Slags Ting maa man helst ikke tale alt for meget om, naar det ikke er nødvendigt. Lad os heller faa Gerningerne frem i Stedet for alle disse Ord, Ord, Ord!

Hr. Konoy spurgte, om der var nogen nede fra, som havde indvirket paa os og vor Holdning i denne Sag. Hr. Konoy kender mig og ved, at vi er meget selvstændige Personer. Vi lader os ikke paavirke af nogen, og det behøves heller ikke. Noget andet er det selvfølgelig, at der er Personer nede, som her staar paa samme Standpunkt som vi. Vil han tage en Dyst med dem, saa vær saa god! Her i Tinget maa han nøjes med os, mig uværdige og andre.

R. Rasmussen: Eg skal siga nokur fá orð til tingmannin í Fuglafirði, síðani til Eftersøo. Hin fyrri byrjaði við at siga, at hendu sak hevði vakt uppsikt uttori í kongarikinum eins og heima í Foroyum. Tað er nógso djarvt av honum at byrja við at peika á ta uppsikt, hendu paragraff 7 hevur vakt uttori. Vit eru fullvæl vitandi um, hvussu stór tann uppsiktin er, men — hvussu er hon uppstaðin, og hvor hevur nort hana? Andrass Sámalsson er bæði faðir og móðir at hesi uppsikt. Hann hevur gjort, hvat hann hevur kunna til at fáa Danir at missfatta alt, sum logtingið vildi gera, fyri at leggja alt tað illa inn í tað, sum leggjast kundi, fyri at útbreiða sakina við sínum illgrunandi, spillandi kommentarum. Tað er satt, sum tað er

sagt, at brotsmaðurin sloppur ikki frá at mala um tað, har missbrotið er gjort, og soleiðis er við tingmanninum í Fuglafirði. Tað hann hevur gjørt her, er eitt skammuligt misbrot móti tí nationala partinum í skúlamálinum. Tað er eyðkent fyri hesa sama tingmann og hansara fatan av mannasøguni, at hann ikki tykist hava ámælsi um, hvør leiðin er hjá oinum fólki, sum tjóðskapliga reisur seg, og at hann rósar sær av, at hava verið hesum reisningi at bana, meðan allir kunnsgerningar tala eitt mótsatt mál. Hvat virkar sagan upp á tingmannin úr Fuglafirði? Nakað eins og vatn á gás. Hann hevur líka lítla fatan av mannasøguni sini av Føroya sogu, hann veit ikki, at hin tjóðskapligi reisningurin er tað einasta, sum kann halda eitt fólk í lívi. Hann gremur seg um, at so nógvur tvídráttur er um hesa sak, og at ein slíkur tvídráttur skal vera reistur. Tað var ein tíð, tá ikki var so nógvur tvídráttur um hetta mál, tá var tingmaðurin í Fuglafirði uppi í at reisa tað. At hann nú við húð og hári hevur givið seg yvir í hin motsetta partin, loggi eg onga vekt á. Men táið Andrass Sámalsson í Føroyingafelags dagum stóð á vakt fyri føroyskum máli, tá hevði hann við gleði tikið tankanum um, at føroyskt skuldi verða undirvísingarmál í skúlanum. Tá var tó undirvísingarmálið frítt....

A. Samuelsen: Tað var danskt....

R. Rasmussen: Andrass Sámalsson *veit*, at tað var føroyskt. Ella kunnska hann veit tað ikki, tí hann hevur kunnska ongatíð gingið í skúla. Nú gremur hann seg um, at hetta klandri er reist, men hvør hevur ansvar fyri hesum stríð i og at stríðið er blivið so bitturt, sum tað er, um tað ikki er sambandið! Tað var ein hin fremsti sambandsmaðurin, sum skapti málslagið í § 7 — frammanundan var undirvísingarmálið frítt, — § 7 skapti stríðið. At henda § 7 er væl tilrættalogd, vil eg ikki nokta; eg vil tó heldur siga, at hon er *snedliga*, ógviliga snildisliga gjørd, nemliga soleiðis, at § 7 gav hvørjum kennara í Føroyalandi so undirbráttligan, at hann hevur administrationins hendini á nakkanum á sær, hvat mál hann brúkar. Tí hon er beraknað uppá at forlokkast. Sambandsmenn forútsettu tá, at skúlastjórnin fór at verða sambandsk; formaðurin í stjórnini var tá soleiðis sinnaður yvirfyri tí nationalu spurningunum í Føroyum, at hann spesielt hataði føroyskan nationalitet í skúlamálum. Við teirri hensikt bleiv § 7 gjørd, at hesin maður skuldi hava sína hørðu hond knýttað yvir høvdunum á Føroya kennarum. Tað var grundarlagið undir § 7. Nú er kanska øðrvísi enn tá. Og kanska tann maður, sum fór frá Føroyum, var so mikið tandur, at hann ikki torði at bevila tað, sum hann hevði gjort. Tað er ósunt, at eitt paragraff skal kunna útnyttast politiskt. Tí er paragraff 7 av tí ónda og tí má hon burt. Undirvísingarmálið má vera danskt, tí bøkurnar eru danskar, sigst tað. Ja, bøkurnar eru danskar, men henda sak serligt sær um tað munnliga málið. At nakar nýtir danskar bøkur, er eingin grund fyri, at lærumálið skal vera danskt. Í Danmark hevur mann notið framsnadar bøkur við teir hægru skúlarnar; men lærumálið hevur ikki verið annað enn danskt. A. Samuelsen smoist ikki fyri at siga, at heila hendan sak er eitt rabaldurmunnar. Meiri nýtist ikki. Harmast siktar hann sjálvstýrismonn fyri, at teir eru fegnir um at teirra uppskot frá ífjør ikki er gingið igjognum. Hann, sum vil fara undir at ordaskiftast við A. Samuelsen um hetta, er tann ringari maðurin. Um sjálva sakina hevur bæði prósturin og Konov útlatað seg týðiliga um, hvat endamálið er og hvat týðning sakin hevur. Eg vil halda meg til tað meiri persónliga. Tað er kedjiligt, at Effersøe ikki er her tilstaðar. Hann byrjaði við at siga, at sjálvstýrismenn hava bókmenntað danskt sum eitt fremmant mál. Hetta skulu sjálvstýrismenn m. a. hava gjort í 1911. Eg vil siga, at hetta gevur hvørki eitt ella annað imtrykk fyri hvussu vit standa yvirfyri danska málinum. Tað er ikki skeldarorð at siga: fremmant mál. Teir siga, at vit hava einki bevis fyri, at danska málið er eitt fremmant mál. Eg skal fara eitt vitnisburð fyri tí, og tað er tingmaðurin á Tvøroyri sjálvur. Hann talar her á donskum máli, og hann gongur út frá, at hansara danska mál ikki merkir hann sum ein fremmandan mann. Tað mál, sum hann talar, er danskt mál talað av fremmandari tungu. Hansara mál vil í donskum øvrum merkja hann sum útlendingin, so skjótt hann letur munnin upp. Ein maður sum Effersøe, sum tó hevur lagt stóran dent á danskt mál og til at dugna at tala tað — tað hoyrist tó fremmant í hansara munni. Eg vil nú ikki tala um tingmannin á Strondum. Hettar er einki at siga mannunum til lastar. Eingin av okkum talar betri danskt mál enn tingmaðurin á Tvøroyri. Og tá hann álikavel ikki hevur verið mentur at tilegna sær tað - - er so ikki hor tann besti vitnisburður fyri, at danskt mál hjá okkum er eitt fremmant

mál. Eg vil vóna, at eingin er so fávitskutur, at hann kallar tað annað. Tað er eitt mál, sum vit hava nógvan kunnleika til og brúk fyri. Effersøe skyldar prástin og aðrar fyri at vera doktrinærar og teoretiskar. Eg veit ikki, hvat Effersøe forstandur við doktrin og praksis. Men her er hann ikki á leið. Grundin til, at vit vilja hava føroyskt í skúlarnar, er tann praktiska, at hvort barn, sum kemur í skúla, talar føroyskt, og tí eigir at talast til børnini á hesum máli. Vit mugu ganga út frá, at tangumálið er eitt miðdil og ikki formálið í skúlunum, og at tað er einki annað mál, ið kann nýtast til munnligt undirvísingarmiddil enn tað mál, sum børnini eiga. Og hetta er serliga galdandi viðvíkjandi almenninginum. Nú hevur A. Samuelsen hildið fram, at slíkt verður til undirgang fyri okkara fólk, og serliga fyri almenningin. Vit fáa við hetta lagið ein ópplýstan almenning og nakrar ríkar menn, sum ráða yvir øllum, sigir hann. Tað er tvørtur ímóti. Ein almenningur fær aldrinn nakra upplýsing utan við móðurmálinum. Søgan sigur hetta greitt. Danmark fekk ongan fólkaupplýsing fyrr enn danskt mál varð nýtt sum undirvísingarmál har. Meðan hin tilstandurin verður tann, at tað vera einans nakrir fáir menn, sum koma sær framm — tílíkir, sum miðlar og pengar eiga, A. Samuelsen sær heilt rangvent á hesi viðurskiftini. Hann er sum Ibsens Per Gynt var inni í fjallinum. Alt var ovugt fyri honum. Hvítt bleiv tit svart, heygar blivu til hol, upp vendi niður. Alt var rangvent. Sambandsmenn eru verðnir trolltiknir. So at tá teir halda hetta einans vera teori hjá okkum, so kemur tað av tí, at teir siggja alt tvørvent. Tað sum vit kalla praksis, kalla teir teori. Og umvent. Táið sagt verður, at tað er doktrinært av okkum at vilja hava hetta fram, so má tað vera tí, at tað ið vit kalla praktiskt, kalla sambandsmenn doktrinært og umvent. So segði Oliver Effersøe nakað, ið gevur honum, eins væl og sambandsmenn yvirhoyur hava tað, eina slíkandi líkheit við Per Gynt: »Vi Sambandsmænd behøver ikke at lade os paavirke«; ja, er tað ikki so, sum stendur í Per Gynt; »Trold vær dig selv nokle i hinum nationale spørgsmaal kunne sambandsmenn ikki undgaa«.

Formaðurin: Hr. Andreas Samuelsen retfærdede et Par Spørgsmaal til Skoledirektionen. Jeg maa hertil svare, at jeg ikke anser mig for berettiget til at afgive nogen saadan Erklæring. Hr. R. Rasmussen sagde, at en tidligere Formand i Skoledirektionen hadede det nationale. Jeg tør her forudsætte, at han mente det færøsk nationale. Efter det Kendskab, jeg har til min Forgænger, tror jeg ikke, at han paa nogen Maade har næret fjendtlige Følelser overfor det færøsk nationale. Saa sagde han, at Skoledirektionen var politisk. Hertil skal jeg bemærke, at de to Medlemmer indtager deres Plads i Henhold til Udnævnelse, medens kun det tredje Medlem vælges af en politisk sammensat Forsamling.

Prásturin: Tosið er komið nakað langt burtur frá tí centrala í sakini. Tað var nakað, eg beint merki í, av tí nógva, A. Samuelsen segði, nevniliga, at tær upplýsingar, eg segði, at ministeriið longu hevir, ikki eru so lættar at finna. Eg trúgvi ikki, at tað man vera so turfort at finna tær framm, í ministerinum liggur einki soleiðis og sloðist, og eg eri fullvísur í, at teir hava fulla greiðu á teirra sokum, og eg halði tað ikki vera uppá sítt pláss, at vit skulu samtykkja fur at senda ministerium tær upplýsingar, tað longa hevir fingið. Eg dugi ikki at finna aðrar upplýsingar millum teirra, ið sambandsmenn krevja, ið ikki standa á skúlaplánunum, enn »Forsommelser ved Uvejr«. Øll onnur forsomilsi verða uppfard á listan og send til ministeriið, so eisini tað er lagt fyri ministeriið at siggja hvussu nógv forsomilsi eru og av hvørjari grund. Alur tykir, at øll Samuelsens tala er bygd uppá tað grundarlag, at um okkara uppskot verður samtykt, so verður tað so eiða sort fyri at børnini læra at lesa danskt í Føroyum, tí at danskt eftir okkara uppskoti verður heimleyst í Føroyum. Hatta er burtur í vón og vit sagt, hatta er heilt skeivt. Vit gera ikki danskt heimleyst í Føroyum, men hevir tað nakran tíð áðr heim hjer soleiðis sum A. Samuelsen meinar? Í greinum 7 stendur, hvat ið lærast skal í skúlunum: religión, munntligt danskt, skriftligt danskt, rokning o. s. fr. Vit hava einki uppskot framsett um at taka burtur danskt og danska rættskrivning! Eg kundi haft lyst til at siga nakað til sýslumanin Effersøe, sum R. Rasmussen longu hevir svarað uppá, at vit sjálvstøðismenn ikki taka hensyn til tað virkuliga, at vit eru nógv av doktrinærir. Eg skal bert siga, at allar fáa rættindir, og havi gjørt sítt hesarí, og og havi tó fingist eitt sindur við skúlaarbeiði, vísa allar tann sama veg, sum skúlamenn í útheimtinum eisini eru sannsintir um, at fæst einasti virkuliga rætt til at læra børn heilt at skilja tað ynsta

lærugreinir, er at nýta móðurmálið, tað mál, børnini tosa í heimunum, tað er eitt gott grundarlag, ið hevir sína rót í virkuligheitini, so væl sum nakað, og tað er so væl botnað, at er ikki so, so er allur skúlaskapur um allan heimin bygdur á ein grundskeivan botn, og eg vil vóna, at hr. Effersøe og hr. A. Samuelsen, sum hava gjørt eitt nýtt uppdagilsi í hesum máli, vilja hera tað framm, so fólk í útheimunum kunnu broyta teirra skúlaskap, ið altso má hava verið aldeilis ørur. A. Samuelsen segði, at vit høvdu borið okkara uppskot framm við góðari samvitsku; ja, tað kunnu vit og gera vit eisini. Tað er vorðið sagt, at vit vilja reka danskt burtur; nei, men hví skulu vit ikki hava loyvi til at siga, hvussu okkara hjartalag er yvirfyri okkara móðurmáli? Effersøe undrast yvir, at vit siga, at vit eru góðir við danskt mál, hann tykist undra seg yvir, at tann partur av Føroyingum, sum er góður við føroyskt mál og hevir stríðst fyri tí, at hann kemur og sigir, at hann eisini er góður við danskt mál. Hann heldur hetta vera næstan ov nógv. Men fyrst táið vit hava lært at elska okkara egna, kunnu vit hava forátsetningar fyri at kunna fata og virða, hvat onnur elska.

Joen Poulsen: Hvad jeg kritiserede i Provstens første Tale, var, at han sagde: »ult so nógv« og derfor troede jeg, han mente, at han havde større Kærlighed til dansk Sprog end Sambandsmænd, og det mente Hr. Effersøe ogsaa. Jeg skal gerne indrømme, at en Dansker taler bedre Dansk, end naar Effersøe og jeg taler Dansk, men jeg tror, at f. Eks. første Gang, man hører en Bornholmer tale, tror man, at det er en fremmed Dialekt, uden at jeg derfor paa nogen Maade vil sammenstille Færøsk og Bornholmsk. Det er nemmere for Udvalget at samle Oplysninger end det er for alle os andre at skulle samle dem hver for sig. Provsten fremhævede, at alle Forsømmelser fremgik af Forsømmelseslisterne uden Forsømmelser ved Uvejr, ja, men det er ogsaa en stor Del af de samlede Forsømmelser. Jeg har hørt fortælle, at fra et Sted saa nær ved Thorshavns Skole som Argir, har det ofte hændt, at Børnene ikke kommer til Skolen paa Grund af daarligt Vejr. Og paa Bygderne maa man regne med, at hvor en Lærer har 2 Skoler, der bliver for hver Bygd kun Undervisning Halvdelen af Skoleaaret, og ¼ af Tiden gaar maaske tabt ved Forsømmelse paa Grund af Uvejr. Det er et stort Procenttal af Forsømmelserne, og det skyldes altsaa ikke Uvilje, men Hindringer, som ikke kan overvindes. Hr. Konoy spørger, hvad Gavn Danmark kan have af at fordanske os. Jeg tror ikke, der er et eneste Menneske i Danmark, der tænker paa at fordanske os. Men saa udtalte han, at efter hans Mening burde Danskerne være taknemlige for, at vi vilde lære deres Sprog. Jeg maa sige, at jeg for mit Vedkommende ikke forlanger nogen Tak; naar jeg har lært Dansk, var det for min egen Skyld, for at jeg derigennem kunde læse de Bøger, jeg ellers ikke vilde haft Adgang til. Jeg sætter nok Pris paa de færøske Bøger, der er, og læser dem gerne, men de forslaar kun saa altfor lidt. Naar Færinger efter Evne lærer deres Børn at læse Dansk, saa er det ikke Danskerne, som har Grund til at takke derfor, men Børnene selv for deres egen Skyld. I denne Forbindelse nævnte Hr. Konoy, at vi laa opad et stort Kulturland. Ja, men dette Sprogsamfund har vi ikke nødig at ty til, saa længe vi gennem Dansk kan tilegne os alt, hvad der er tilstrækkeligt for, hvad almindelige Mennesker behøver. Hvis det er Meningen at uddanne os til Videnskabsmænd, ja, saa har vi ikke blot det engelske Sprogsamfund, men hele Europa, Amerika og Asien, maaske Afrika med at øse Visdom af. Ellers kan der maaske være Grund til at gøre opmærksom paa vor Beliggenhed saa nær opad det store Kultursamfund, Hr. Konoy nævnte. Jeg er nemlig bange for, at hvis den Politik fortsættes, som man nu er inde paa, kan det føre til, at vore Efterkommere lærer det store Kultursprog i Stedet for Dansk. Og det er et Spørgsmaal, om det vil være til Gavn for vore Efterkommere.

J. Patursson: Eg hevði ikki ætla mær at tosa í hesum máli, tí her havi eg talað fyri meg líka síðani 1889. Men tá tað hevur verið sagt, at Danmark hevur ætlað av, at vit duga danskt mál, so vil eg siga, at tað er enn meira til ætlan og týdning fyri Danmark, at føroyingar læra væl at tala og brúka teirra egna mál. Tað er ein ætlan fyri Danmark, at tað, meðan tað hevði okkum í hond, hevur lagreitt okkum so væl, at vit goymdu okkara gamla mál. Danmark hevur ætlað av at Íslendingar í felagsskapinum við Danmark hava goymt teirra mál, tí íslendskt og føroyskt mál er hin forna norræna tungan, sum er móðir at donskum máli. Hetta mugu allir mentaðir danskir menn, tá teir sansa sær, vera stoltir

av, at teir hjá okkum um eiga hitt livandi upphavi til ta donsku tunguna, teirra egna lands mál.

S. P. úr Konoy: Eg meini ikki, at vit gott kunnu siga, at tað er nokk fyri okkara lærarar og skúlaborn bara at læra danskt, tí tað er ovlítið. Eg má vel spyrja, hví sambandsmenn ferð eftir ferð seta tað framm, sum um tað bara ræður um at læra danskt; um tað er teirra formál at danisera okkum. Jógvan Poulsen sigur, at um tann politikur, sum nú verður førdur, skal fortsetast, so vil hann føra til, at okkara oftirkomarar taka við eingilskum máli ístaðinfyri danskt, men eg skal siga Jógvan Poulson tað, at viss tann politikur verður førdur í Føroyum, sum skrivaður stendur í § 7, og hvørs ondamál er at taka grundavlagi undan einum fólki, so svuri eg ikki fyri nøkrum, Danskarar eru vit ikki og trúgvi og ikki, vit blíva. Men eru vit farnir á glið sum Føroyingar, so kann tað vera so ógviligt skjótt, at tað gongst okkum, sum tað hevur gingist Hetlendingum, tí tað er ein forbavsandi fartur, Føroyingar taka við eingilskum. Vildi Jógvan Poulsen í álvara verið við at bevara danskt mál í Føroyum, so átti hann við okkum at sagt við Danskararnar: Rørið ikki við grundarlagið! Um hetta evni skrivaði Georg Brandes á sinni eina frálíka kronik í »Politiken«, men hvussu var tað upptikið av sambandspartinum? Já blað teirra gjørdi grin við tað. Hvat var tað, maðurin tosaði um? Eingilsk fára! Nakað slíkt var ikki til. Serliga var tað ein Andreas Joensen, ið tá førdi tað stóra orðið, nú er tað ein Andreas Samuelsen, sum niðri í Danmark ræðir við — tí eingilsku fárunni! Sambandsins støðu fati eg ikki.

A. Samuelsen: Eg vil svara uppá forskelligar bemerkningar, sum deils hava verið heinvendir til mín og deils til Effersøe, sum ikki er tilstaðar. Ja, Effersøe er ikki rýmdur, tí tað var lýradagur ígjár, eiheldur tí hann var bangin fyri tí, sum próstin, Rasmus Rasmussen, Jóanes Patursson ella Konoy høvdu at siga. Nei, hann hevði við stórum plasér kunna givið teimum allum ein sovorðnan frammaná, at teir høvdu noydst til at rýmt út — sum teir eru vanir táið teir fáa eina skortflongju.

Rasmus Rasmusson helt tað vera nakað mótað av mær - - so nú siggi eg, at tingmaðurin úr Kirkjubø for, og sýnist ikki hann skuldi farið, tað var tó ikki lýradagur ígjár - - hann holt tað vera nakað mótað av mær, at eg skuldi draga tað framm at henda sakin hevði vakt uppsikt niðri í Danmark. Nei, eg eri ikki bangin fyri at koma inn uppá tann spurningin, eg foli gleði yvir, at hendu viðtøkuna er blivin kend niðri í Danmark, og havi sjálvur lagt mær eina við at gera hana kunnuga. Eg vil aldeilis ikki krúpa frá ansvarinum, hevði eg eitki haft gjort til tað, so hevði eg haft pátikið mær eitt so stórt ansvar, sum eg ikki hevði verið mentur at burið. At eg havi framatillað sakina sum eg meini hon skal fatast, behavir hann ikki at vera í tvívl um, men faðir og móðir at tí uppsiktini, sum uppskot teirra hevur valdt, eri eg ikki; tað er uppskotið sjálvt. Umframt tað, eg havi tosað opinlýst í ríksdagnum og á møtum havi eg eisini tosað nógv við menn í ríksdagnum og ministerinum um sakina. Eg foli meg aldeilis ikki sum nakran forbrótara fyri tað — og hugsi tað var tað, Rasmus Rasmussen kallaði meg fáið hann tosaði um brotsmannin. Men so snakkaði hann eisini um »misbrot«, og veit ikki hvat tað er, men tað má vel vera tað mótsatta av »bróti«, ein »misbrotsmaður« er altsaa tað mótsatta av einum »brotsmanni« — fyri so vitt kann eg geva Rasmus Rasmussen rætt, táið hann kallar meg »misbrotsmann«. Hann hevur sovorðið lyndi til at brúka fremmandorð og eisini føroysk orð, sum hann ikki forstendur. Maðurin er jú ikki serliga væl bogávaður, men í øll hesi ár, hann hevur fingist við at vera lærari, er hann av og á dottin yvir forskellig orð, og nú er hann eftirhondini blivin 40 ár, so nakað hongur jú altíð við í so nógv ár. Vit aðrir, sum forstandu hesi úttrykkini og vita, hvat tey hava at týða grína sjálvsagt at Rasmus Rasmussen - - og siggi at Rasmus Rasmussen grínur við - - at sær sjálvum. Gott fyri hann, at hann ikki forstendur situatiónina meira enn so, at hann kann grína at sær sjálvum.

R. Rasmussen vil siga, at eg havi sagt, at tað verður okkara fólki at bana um føroyskt verður undirvisingarmál í Føroyum. Soleiðis havi eg ikki sagt tað. Men um alt verður viðtikið, sum var viðtikið ífjor, so vil tað vera okkum at bana. Ein studentur, sum hevur skrivað í studentarbladið, sigir: »Jeg vil ikke sige, at Børnene intet kommer til at lære af dansk Sprog, men det bliver ikke meget: det bliver ikke saa meget, at de efter deres Skoletid kommer til at give sig af dermed, thi det vil blive dem saa vanskeligt, at de ikke gider. Lad mun saa sige, hvad man vil. Dette bliver Resultatet. Eg

gangi út frá, at hetta er eitt av teimum mest betýðiligasta studentunum, sum vit eiga. Og hettar er væl eitt av teimum, sum er sálin millum teir studentarnar, sum hava skrivað brævið. Tað sum hesin maður sigir, fellur saman við tað, sum allir fornuftigir menn her á landi siga. Hettar er ikki bert nakað, sum vit sambandsmenn siga. Men ein Suðroyingur, sum hevur gingið í tann sama svarta skúlan sum prósturin, sigir tað sama. Og um prósturin vildi lata upp fyri tí, sum hann meinar í sínum hjarta, so vildi hann eisini forfegta ta somu meining, sum hesin studenturin. Men eg vænti ikki, at prósturin fer at siga tað. Eg eri fegin um, at hesin studenturin hevur sagt hetta. Og tað pynlar sjálvstýrisflokkin, at teir hava ein mann, sum sigir sannleikt. Eg vildi ynskt, at sjálvstýrisflokkurin ikki hevði mætari menn enn próstin, R. Rasmussen og Konov. R. Rasmussen helt, at eg ikki var førur fyri at fata søguna. Um eg havi gingið í skúla ella ikki, tað vil eg ikki orðaskifta um. Tað kemur ikki sakini við. Vit vita jú, at prósturin og R. Rasmussen hava gingið í skúla. Men tá R. Rasmussen sigir, at eg ikki fati hin tjóðskapliga spurningin, so kann eg svara, at eg havi verið við av fyrstan tíð, tá vit byrjaðu at arbeiða og tá R. Rasmussen lá, ella hann gekk niðri í Danmark. R. Rasmussen hevur einki gjørt fyri okkara tjóðskap fyrr enn spurningurin var reistur her. Hann hevur notið gott av, hvat vit gjørdu. Tað hevur prósturin eisini. Ganska víst hava teir misbrúkt hetta hevegilsi, men gott hava teir notið av tí. Tað sama er við Konov. Tá harðast stóð um her, tá rømdu teir til Danmark at fjálga ser, meðan Føroyingar bardust her uppi fyri at vinna tjóðskap. Sambandsmenn hava ikki staðið aftastir fyri at styðja føroyskar skúlabøkur og styðja tann mannin, sum mest hevur gjørt til at útgeva føroyskar skúlabøkur. Og sambandið hevur verið við til at stiga hvort spor, sum her hevur verið gjørt fyri okkara móðurmali. Um tað so er háskúlin, so hava vit verið við — ólúkkuligvís. Her skuldu vit hava verið eitt sindur meiri fornuftigir. Vit eru skuffaðir av teimum mønnum, sum standa fyri hesum skúla. Men vit vildu royna at gera nakað gott fyri Føroyingar. So talar R. Rasmussen um ein mann, sum fekk § 7 inn í hesa anordning. Hann vildi ikki nevna hann. Hví? Hetta bleiv viðtikið her á tingi í 1911 og av tí er tað komið í anordningin. R. Rasmussen skuldi vita, hvør maðurin var sum formuleraði hesa paragraff. Tað veit R. Rasmusson ikki. R. Rasmussen sigir, at paragraffin er smaliga gjørd. Slíkt er væl tað besta R. Rasmussen kann siga. Hann hevur vilja til at upptreda smalugt. So talar R. Rasmussen um at § 7 kann fortolkast, so at skúlastýrið hevur hond um kvørkin á hvørjum lærara. Soleiðis hevur skúladirektiónin hjá okkum ikki verið, hvørki tá vit høvdu ein formann sum »hataði« føroyskan nationalitet ella fyrr. Eg haldi, at paragraffin er so, at hvør samvitskufullur lærari kundi fortolka hana. Hon forútsetur lærarar, sum eru loyalir í sínum arbeiði og sum vilja, at børnini skulu hava frama bæði í føroyskum og í donskum. Hon kann misbrúkast um lærarnir skuldu verið minni housýnsfullir og havt onnur housýn. So talar R. Rasmussen um ein formann í skuladirektiónini, sum hatar føroyskan nationalitet. Hesi orð passa ikki til nakran skuladirektiónsformann; men tað er ætlanin við hesum orðum at kasta skarn eftir tí amtmanni, sum farin er úr Føroyum. Hví tordi R. Rasmussen ikki at siga tað við hann, tá hann var her? Vit vita allir, at R. Rasmussen aldri tordi at siga tað við hann, táið hann var her, og og veit, at tað kann bevísast, at hetta er ein svartari ósannheit enn hárið á R. Rasmussen. Hann hataði ikki okkara nationalitet, hann elskaði okkara fólk og hann ofraði tí síni bestu ár, og táið Føroyingar seinni utan ta hatskheit, ið nú er, vilja betrakta tað arbeiði, hann hevir gjørt her í Føroyum, vilja teir anerkenna, at hann hevir ært av tí, og at Danmark hevir haft ørn av at hava haft hann sum amtmann heruppi. R. Rasmussen hevir aldri haft mót til at siga honum hetta upp í eyguni; hatta er nakað heilt annað enn hvat ið Tingakrossur ofta hevir brigslað R. Rasmussen, at hann var dagligur gestur í amtmannshúsinum, at hann íðiliga sat har í teimi bleytu sofaum og drakk chokolatu og reykti cigarir og hvði tað gott; og trúgvi nú ikki, at tað var fult soleiðis, men Tingakrossur sigir frá hesum, og Tingakrossur er jú R. Rasmussens blað. Táið nú R. Rasmussen, aftaná at amtmaðurin er farin heilir eitt ílat við nokrum illavørðnum innihaldi yvir hovdið á honum, so haldi og hetta vera eina skomm fyri hann. Eg fyritrekki at siga honum alt hetta upp í eyguni, og ikki upp á bakið, sum aðrir brúka her á tingi. R. Rasmussen segði, at eg vildi hava danskt undirvísingarmál, ti bókurnar vóru danskar; eg hevði ikki trúð, at R. Rasmussen hevði so ring upplatilsisevnir, men eg vil ikki taka upp aftur, hvat eg segði, tí hann sjálvur

uppfatilsisevna er væl ikki batnað, nú tíðin er so langt útliðin, men heldur versnað. R. Rasmussen segði, at eg hevði sagt, at tann føroyska nationala sakin er eitt rabaldurmunar; her vísir R. Rasmussen aftur, at hann er ikki mentur at uppfata, hvat aðrir siga, ella ikki mentur at úttrykkja, hvat hann kundi uppfata. Eg segði, at táið sjálvstýrismenn reistu ta nationalu sakina, var tað eitt rabaldermunar, vit nýta ikki R. Rasmussen, prást Dahl, Símun Pavla úr Konoy, tann føroyska nationala sakin er í góðum londum; vit sambandsmenn unna Føroyum líka væl sum sjálvstýrismenn. R. Rasmussen framførdi nakrar persónligar bemerkningar til sýslumann Effersøe, eg vænti, at Effersøe vil svara sjálvur, so eg skal ikki siga stórt um tað. R. Rasmussen segði, at hann vildi ikki vera sakligur móti Effersøe, hann vildi vera persónligur; eg helði, at hann var sakligur, so vítt sum hann kann vera sakligur. R. Rasmussen segði, at Effersøe hevir beskyldað sjálvstýrismenn fyri at hava sagt, at danskt er eitt fremmand mál heruppi; tað hava sjálvstýrismenn sagt. Teir hava ikki bert roknað dansk fyri eitt fremmand mál, men enn meira eitt minni væl fagnað fremmand mál. So reyndi R. Rasmussen at kritisera Effersøes danska mál og Jógvan Poulsens danska mál: eg havi hoyrt frá monnum, ið hava ógviliga væl skil á málum, at Effersøe talar væl danskt, tað bæði ljóðar væl og hann fær væl úttrykt, hvat hann meinar, í mótsetning til R. Rasmussen; vit hava tað uppfatilsi, at hann ikki altíð sjálvur fatar, hvat hann sigir, tá hann tosar føroyskt. At Effersøe ikki talar jysk ella kjøbinhavnskt kjallaradanskt, ella at Jógvan Poulsen ikki talar kjallaradanskt, haldi eg vera sjálvfylgiligt, men eg hugsi, at Danskarar sjálvir vilja innrømma, at Effersøe talar betri danskt enn Danskarar sjálvir. Og so, hvussu kann nakar siga, at danskt er eitt fremmand mál heruppi, eitt mál ið hevir verið brúkt í kirkju og skúla heruppi í mong hundrað ár, man kundi líka so gjarna sagt, at R. Rasmussen var fremmandur í Føroyum, tí hann er bert 45 ára gamalur. R. Rasmussen sigir, at hvort barn í Føroyum tosar føroyskt; ja, men hvort barn í Føroyum lesur danskt og lesur tað betri enn føroyskt. Nú kann man kannska siga, at hetta er ein skomm, men tað má sigast, at tað føroyska, ið verður skrivað av teim monnum, ið ora frammi í, ella kalla seg at vera frammi í tí nationala arbeiðinum, tað er eitt mál, ið ikki er føroyskt, og ikki hevir verið føroyskt sjálvt tá okkara abbar og ommur livdu, vit noga fara til Íslands fyri at finna tað málið aftur. So segði R. Rasmussen um Effersøe og sambandsmenn, at teir líktust Peer Gynt, ella Peer Jynt, sum hann segði; at vit vóru sum trøll, ið sóu svart fyri hvítt, og tað ið vendir upp fyri at venda niður. Eg veit ikki; eg siggi R. Rasmussen svarthærdan, tað kann vera, at hann er hvíthærdur; prósturin er heldur svartkloddur, so vítt sum eg dugi at siggja. Nei, R. Rasmussen hevir bert viljað vist, at hann hevir lisið norskan litteratur, hann hevir jú góða tíð til tað, táið tingið ikki er, so hevir hann her fingið fatur á eina norska bók, og nú vil hann lata okkum vita av, at hann hevir lisið hana. Í dag verður tað brikslað okkum, at vit siggja alt øvugt; fgjár sóu vit altfor negtornt uppá sakirnar; eg veit ikki um vit duga at siggja, at háskúlin liggur úti á Frælsinum, men kannska hann ikki liggur har? Tað er soleiðis við R. Rasmussen, at ilsinnið virkar soleiðis uppá hann, at hann verður heldur tápuligur (R. Rasmussen fer út) og táið hann ikki tímir at hoyra meir, rýmir hann út og Strøm aftaná hann. — So segði Konoy, at vit sambandsmenn eru okkum sjálvum nokk og myntaði tað uppá Effersøe; nei, Effersøe hevir alla tíð roynt at útvikla seg, sum hvør annar klókur maður, eg havi eisini roynt tað, sjálvt um eg ongan skúlagang havi haft og eg ongantíð havi verið á háskúla, men eg havi roynt at lisið bøkur og eg havi lisið føroyskan litteratur og føroysk blað, og tað eri eg glaður yvir, tí tá havi eg lisið eina ljóta grein um Danskarar av einum framminligum sjálvstýrismanni, ið nú er limur av skúladirektiónini, og við síðuna av honum stendur Føroya prástur, hann er heilt einigur við honum. Tá amtmaðurin upplýsir, at hann heldur seg ikki vera berættigaðan til at framleggja nakra avskrift, so er tað, ið fyrr vorandi amtmenn hava gjørt, ein stórur bummarbur, tá teir hava fingt upplýsingar fram frá skúladirektiónini, táið sjálvstýrismenn kravdu tað. Teir eru løskednir menn, tað má man siga, sum nú nojast við at fáa sneis til upplýsning. Tað er interessant, at hesir sonn menn, sum fyrr buldraðu í, tí teir ikki kundu fáa allar moguligar orkleringar at siggja, teir hava nú heilt uppgivið at fáa nakrar upplýsningar. Men tað kemur kann tíð, tá teir vilja vinka við teimum orkleringum, sum eru avgivnar í hesari sak, tí tað er jú altíð so, at tá ein veit fullan besked, so vísir tað seg, at har er einki at agitera við, men tá ein einki beskoð veit, so ber

so ónatúrliga væl til at agitera. Og tað er ein agitasión, sum kann forast í loynslum, og tann agitasjónin er tann farligasta. ti hon tørur grundina burt undan ti, sum verður agiterað ímóti. Ti dámar sjálvstýrismonnum hesa agitasjónina best.

Prógtin vildi gera tað til, at eg hevði sagt, at undirvísningsplánir høvdu ligið slæddir og spjaddir í ministeriinum. Prógtin hevur ongan rætt til at venda míni orð, tað mátti ikki somt honum at gongeva míni orð skeivt, men prógtin kennir kannska eisini ein mann, sum einaferð skuldi senda eina erklering til ministeriið, men ikki gjørdi tað. Tann maðurin at Jákup Dahl. Eg havi sagt, at vit sambandsmenn plaga at leggja sakirnar til rættis soleiðis, at vit viðleggja allar upplýsningar, sum krevjast, vit henvísa ikki ministaranum til sjálvur at søkja sær upplýsningar. Vit siga ikki við ministaran: Tú kannst kikka eftir tí, um ikki í vegvísaranum, so í tínum egnu arkivum. So segði prógtin, eg hevði bygt mín kritikk uppá, at danskt fór at verða heimleyst í Føroyum; eg havi roknað við, at danskt fær tað plúss, sum eftir verður, tá alt, sum lærast skal, er tikið við. Eftir teirra uppskoti mugu lærarnir fáa tað uppfatilsi, at øll vekt skal leggjast á føroyskt, og danskt bert skal lærast sum eitt fremmint mál. Tá verður resultatið tað, sum studentarin skrivar, at um børnini kannska læra eitt pinkulítið sindur í skúlanum, so gita tey ikki seinri læra tað. Vit mugu nemliga rokna við tí tí, tá tey eru foreldur, sum ikki elska danskt og ikki kunna danskt mál. — Tað letur til, at menn meina, at sum forhaldini nú eru verður einki lært av føroyskum og lítið av donskum. Tað er eitt feil uppfatilsi; nú kann lærast nakað av føroyskum og vel av donskum. Eg haldi ikki, at teir skuldu lasta oina skúlaskipan, sum hevur fostrað menn sum Konov, prógtin, Rasmus Rasmussen, Patursson, ja og kundi kannska nevnt Nyholm Debess við - - tað mátti verið ein anbefalingur í teirra eygum. Gauska vist haldi eg ikki tað talar til fordeil fyri ta núverandi skúlaskipan, tað er heldur ein minkan fyri hana at hava uppalt menn, sum ganga so langt útum tað, sum tann sunna formuft bjóðar okkum at ganga. Men í teirra eygum má tað vera eitt bevís fyri, at skúlaskipanin er góð, at hon hevur sett eina sovorðna frukt av sær sum Rasmus Rasmussen.

Eg vil hopa, at teir hava borið hetta forslagið fram við eini reinari samvittugheit, men tað er roint individuelt, hvussu man sær uppá tað: at hava eina reina samvittugheit. Sjálvt um eitt politiskt partí bar eina sak fram í útilukkandi partípolitiskum eygnamiði, so kann tað harfyri halda seg hava eina reina samvitsku. Iðitt er sikkurt: tað er ikki borið framm av kærleika til danskt. Og tað er ógviliga tvívlsomt, um tað er skott av kærleika til okkara fólk, sum jú ikki bara eru sjálvstýrismenn, men eisini sambandsmenn. Teir vistu, at hetta spursmálið, sum jú er reist av sjálvstýrismonnum, vildi elva klandur og split í hesum fólki. Tað uppskot, teir har hava framsett, vil reka danskt mál útúr Føroyum, tað skal standa fast — um hensiktin hevur verið yvirlogd yvirláti og til prógtsins samvittigheit at avgera. Eg havi mína egnu meining um tað. Hvatíð Effersøe viðvíkur, eri eg sikkur í, at hann unnar føroyskum máli líka so væl sum prógtin, men hann hevur eisini øll betingilsir fyri at vera góður við danskt mál.

Eg havi tað inntrykk av nógvum, sum framkomið er frá sjálvstýrismonnum um hetta mál, at tað má hava fingið menn niðri og eisini her til at trú, at hesir menn vóru hatskir á alt danskt. Tað skal ikki galda allar sjálvstýrismenn, men soleiðis sum einkultir av teimum hava uppträtt við ynsar leyligheitir, má fólk hava fingið tað inntrykk.

Patursson helt, at Danir kundi vera stoltir av, at vit høvdu eitt føroyskt mál. Tað eru teir. Og Danir hava grund at vænta, at hetta fólk, sum hevur verið so trúfast móti fornfedrunum, at tað hevur goymt tað føroyska málið, eisini vil vera so trúfast móti tí danska málinum, sum vit eisini hava arvað frá fornfedrunum. Teir gomlu Føroyingarnir hildu hendan arvin so væl, at tá tað gekst Danmark væl, so gleddust teir, og gekk tað Danmark illa, so syrgdu teir. Eg kenni til hetta frá tí bygd og tí heimí, sum eg eri uppvaksin í. Og enntá høvdu hesi fólkini aldri verið í Danmark ella hevdu nakað serligt at takka fyri. Hesin kærleikin var hildin uppi av donskum literaturi. Eg kann siga, at sum tað hevur verið hjá mær og mínum, soleiðis hevur tað verið í mongum føroyskum heimum. Eg trúgvi, — at um vit ikki vanslekta - - tað vil vera til huld fyri okkum, at vit eru líka so trúfastir sum okkara fornfedrar móti bæði føroyskum og donskum máli. Og soleiðis kann tað verða, um vit Føroyingar samsintir vilja arbeiða fyri tí. Tá hevdu vit einki tapt. Men nú er arbeiddur ein stemningur upp, sum vil, at vit skulu arbeiða uppá tað føroyska, meðan alt hitt skal botraktast sum ókunnugt. Men tá hevur

man drivið burt nakað av tí tráskapslyndi, sum er í Føroyum. Konoy talaði um, at hann ikki vildi garantora fyri, at Føroyingar komu at lura danskt í framtíðini, um mann gekk framm sum sambandsmenn vildu, og at tað tá kannska kundi henda seg, at vit fóru sama veg sum Hetlendingar. Tað trúgva vit sambandsmenn ikki; men annað var, um vit skuldu isolera okkum við føroyskt mál aleina. So vildi tað ikki vara nógvar mansaldrar fyri enn Føroyingar siga sum so: Vit vilja nakað annað, vit mugu hava eitt mál aftrat, og vit vilja volja tað mest praktiska málið. — Men danskt koma teir ikki at duga tá, og teir vildu tí volja tað málið, sum Hetlendingar hava. So talar Konoy um A. Joensen, sum hevur skrivað móti Brandes um eingilska fáran. Eg haldi, at bæði A. Joensen og A. Samuelsen hava begrundað tað, sum teir hava skrivað og sagt. Eg kenni ikki nakran mann av tí navni, sum plagar at skriva í avísirnar. Men A. Samuelsen kenni eg, og hevur hann sagt nakað, so plagar hann at begrunda tað, og eisini um hann skrivar nakað. Um hesin A. Joensen livir enn, er hann mentur at diskutera við Konoy um tann eingilska fáran. Um eg hitti hann, skal eg siga við hann, at Konoy vil skifta orð við hann,. Eg kann enda hesa ferð. Klokkan er ikki meiri enn sjey enn í kvøld. og og vóni, at formaðurin vil syrgja fyri at vit kunnu halda út til døgurðamál í morgin.

Formaðurin: Den sidste Taler mente, at han sikkert kunde faa at vide min Opfattelse af Sagen overfor Regeringen. Jeg anser mig ikke berettiget til at fremlægge den. Jeg har i tolv Aar haft med offentlige Sager at gøre, men det har ikke været Skik, at Myndighedernes Erklæringer er blevne offentliggjorte. Det er ikke fordi jeg skulde have noget imod det. Og hvis Hr. A. Samuelsen vender sig til Regeringen, er der sikkert intet til Hinder for en saadan Fremgangsmaade.

A. Samuelsen: Eg má takka fyri tey nádigu úttalilsir frá formanninum. Hann sigir, at um eg vil fara til ministeriið at fáa erkleringar, so vil mann ikki harfrá hava nakað ímóti tí. Eg má siga manga takk fyri tað, og eg eri skoltur yvir, at sjálvstýrismenn eru tilfriðs við, at tilstandurin er soleiðis. Formaðurin sigir, at hann meinar ikki, at hann hevur rætt til at geva erkleringar frá skúladirektiónini. So má fyrrverandi amtmaðurin hava gjørt galið. Fyrrverandi amtmaðurin hevur framlagt skriftligar erkleringar, sum eru avgivnar hiðani frá um sakir, sum eru sondar frá tingimum. Um tann amtmaðurin var her í dag, so vildi hann royna at forsvara sítt standpunkt. Eg eri ikki av somu meining sum formaðurin. Mítt uppfatilsi er avgerandi fyri meg. Tað kann vera, at ministeriið ikki vil geva mær avskrift utan erklering frá Føroyum. Um hetta spursmálið verður niðursent, so ætli eg mær ikki at lata tað koma ann uppá ministeriið, men at eg havi eina avskrift til at lata til fólkatingsins finantsútvalg. Eg vil í ministeriinum biðja um at fáa avskrift av teimum erkleringum, sum eru avgivnar herfrá. Eg vil biðja ministeriið um at fáa sakina fuldstenduga kompletta; tí hon hevur týdning fyri heila okkara land.

S. P. úr Konoy: Ellersøe heldur viðvíkjandi studentabrævið, at Danmark sigir sum so: »Moner I virkelig dettea. Eru tá hesi menniskjur í Danmark klár yvir, hvat mál sum talað verður í Føroyum. Tað undrar meg, hví man bara spyr eftir tí danska málinum og ikki eftir øðrum. Teir hava teir tankar, at tað ónormala er vorðið tað normala. Tað sær út, sum Danskarar hava ein iva um, at alt er ikki í okkara skúlaskapi, sum tað eigir at vera; at teir skuhi meina tað sama sum tingmaðurin av Tvøroyri: at tað ónormala er vorðið tað normala. Tuð er mær heilt ófatandi, at danskir menn kunnu hava fingið hesa uppfatan; eg má tí heina ein spurning til tingmannin á Tvøroyri, og eg vil seta hann framm á donskum máli: Kan man tro, at Mand i det danske Undervisningsministerium formener og anser det for pædagogisk og nationalt forsvarligt, at Børnenes Talesprog (Færøsk) ikke skal være Undervisningssprog i Folkeskolen paa Færoerne. Eg má trúgva, at menninnir har niðri ikki vilja, at undirvísingarmálið skal vera barnanna talumál.

Formaðurin: Hvad Hr. Samuelsen udtaler om Skoledirektionen indeholder en Forveksling om, hvorvidt disse Erklæringer kan komme offentlig frem og hvem der kan fremsøge dem. Jeg har altid været klar over, at baade Regering og Rigsdag vil kunne offentliggøre disse Erklæringer, men er af den Formening, at vedkommende Overovrighed ikke er berettiget dertil.

A. Samuelsen: Vil Formanden dermed sige, at tidligere Embedsmænd heroppe, der har givet Tinget disse Oplysninger,

har været uberettigede dertil. Det synes at fremgaa af Amtmandens Udtalelser, at han mener dette.

Formanden: Jeg skal dertil svare, at min Forgænger og jeg efter det, der nu er fremkommet, altsaa er af forskellig Mening paa dette Punkt. Hvis Formening, der er den rigtige, tilkommer det rette vedkommende at afgøre.

O. Effersøe: Efter at jeg havde deltaget i Forhandlingerne til Kl. 5 fra Kl. 1, forlod jeg Salen, ikke for at fornøje mig, men ganske simpelt for at faa lidt Middagsmad. Da jeg kom tilbage hørte jeg af Sysselmand Samuelsen, at der var fremsat nogle personlige Bemærkninger til mig. Sagen har været i gode Hænder, saa jeg har kunnet forsvare at være fraværende den korte Tid, og de personlige Bemærkninger bryder jeg mig ikke om. Efter at jeg er kommet tilbage og Diskussionen nu siden er fortsat saa længe, at Klokken nu er halv otte, vil jeg ikke yderligere forlænge Diskussionen ved for mange unødvendige Bemærkninger. Hr. Konov retter en Forespørgsel til mig. Han burde have kunnet forstaa, hvad jeg mente: om den Skolegang, som Børnene burde have, nu ogsaa fandt Sted, thi hvis det ikke er Tilfældet, hjælp det kun lidt, hvad der staar i Skolelovene; derfor fremsatte jeg mine Udtalelser om, hvorvidt det unormale ikke var blevet det normale. I tidligere Aar har man altid haft det væsentlige, der skulde ligge til Grund for Forhandlingerne, liggende trykt for sig, det har man ikke i Aar, og det er derfor ofte lidt vanskeligt at udtale sig, da man ikke har Materialet ved Haanden. Til Grund for Lagtingets Vedtagelse i Fjor maatte ligge den Betragtning, som Selvstyrepartiet fremsatte, at det var muligt med Færøsk som Undervisningssprog at opnaa tilstrækkelige Kundskaber i Dansk. Men saaledes opfatter jeg Ministeriets Spørgsmaal til os: Kan man nu virkelig det? Er det virkelig deres Mening? — Ministeriet vil høre Lagtingets Mening, inden det tør foretage en Afgørelse i denne Sag.

S. P. úr Konoy: Við tingmannin av Tvøroyri er tað hugnaligt at diskutera hetta her, men tað er jú ikki hetta hjá honum at svara fyri, hvat danskir menn meina um okkara pædagogiska viðurskifti. Eg vildi sett prís uppá at lingið beinleiðis kunnleika til hvussu danskir embætismenn í ministeriinum hugsa um okkara nationalu viðurskifti. tí eg má siga, eg dugi ikki at fata, hvat teirra hugsan hevir verið um hetta tey seinastu 50 ár.

O. Effersøe: Jeg har ikke direkte Kendskab til, hvad man mener nede, og kan kun slutte mig til, hvad man sandsynligvis mener. Jeg har ikke staaet i Forbindelse med Undervisningsministeriet, jeg tror blot, at i Spørgsmaalet om den færøske Skole ser Ministeriet ikke doktrinært paa dette, men rent praktisk, og vil kun se paa, at Dansk ikke udelukkes her oppe.

S. P. úr Konoy: Hetta Effersøe framfordi, var fyri mær heilt interessant: at eitt partur av tí donsku fólki meinar, at danskt má ikke doyggja út hjá okkum. Men hevir tað nakrantíð livað hjá okkum? Við eitt livandi mál skilji eg eitt, ið verður talað, og so er hetta heilt natúrligt: vit tala báðir út frá heilt ymiskum sjónarmiðum.

O. Effersøe: Atter en Doktrin. Kald det, hvad De vil; de levende Sprog eller døde Sprog: Dansk er et Sprog, der har været indlevet paa Færøerne, og Kundskaben til Dansk kan ikke bevares paa den Maade, som Selvstyrepartiet foreslaar. Lad os vogte os for Teorier. Det er rigtigt, hvad en stor Digter har sagt: Gold er enhver Teori, grønt er kun Livets gyldne Træ.

S. P. úr Konoy: Ja, eg má sluttа meg til Effersøe, og eg má hekla, at hesin maður stendur í Føroya lagtingi og talar donskt, hann hoyrir jú heima niðri í Angel, har teir týsku embætismenn forvoxla administrationsmálið við tað mál, fólkið talar. Fyri um eitt mál verður nýtt í administrationini, verður tað ikki tess minni eitt deytt mál í landinum, táið fólkið ikki talar tað.

O. Effersøe: Jeg kan paa ingen Maade indrømme, at Dansk her paa Færøerne er et dødt Sprog.

S. P. úr Konoy: Eg skal bert siga, at hetta er nøktapt, hvat Týskarnarnir framhalda niðri í Angel: at týskt er livandi mál í Suðurjutlandi, tí tað er brúkt í administrationini, meðan fólkið í Angel framhaldur tað málsetta.

O. Effersøe: Hvad er det dog for noget? Jeg har aldrig hørt noget lignende. I Gaar blev Dansk reduceret til et fremmed Kulturmaal, i Dag til et dødt Administrations-

sprog, et Sprog, der i Aarhundreder har levet her og været højt skattet i hvert Fald af den Slægt, der har levet, og som har været brugt under alle Forhold.

S. P. ár Kanoy: Í ti parti av Føroyum, eg kenni, hevir føroyskt mál verið brúkt í ollum viðurskiftum, sjálvt í skúlunum. Sjálvt prósturin Peterson brúkti tað, tá hann kom at inspicera skúlarnar har inni. At danskt hevir verið brúkt av embætismonnunum, vita vit, kemur av tí, at tað kom inn við reformatiónina. Tá varð eisini tað krav sett fram, at man fyri at fáa sína fulla borgarligu rættindi, skuldi vera konfirmeraður, og fyri at verða konfirmeraður mátti man duga danskt, tí bøkurnar vóru á donskum.

Nærsmakkelst administratiónin í Føroyum hevur gjørt nakað, so var tað á donskum máli, men fólkamálið, tað ið livað hevur hjá Føroyingum, tað var føroyskt. Aldri skal tað hukkast sambandsmonnum at fáa forveksla begrepini millum administratiónsmál og fólkamál í Føroyum.

O. Effersøe: Jeg kan mindes fra mit Hjem, et ganske jævnt færøsk Hjem, at min Moder i de lange Vinteraftner plejede at synge for os Børn de smukke danske Sange og Viser, som blev os saa overordentlig kære. Senere hen i min Opvækst overværede jeg de vanlige Dansesammenkomster, og ogsaa her var det i Almindelighed danske Viser, der blev sungne. Og jeg kan mindes, da Baadene drog ud paa eller kom hjem fra Langfart, da sang de altid en Salme — det var en *dansk* Salme, Hr. Konoy!

S. P. ár Kanoy: Bevares!

O. Effersøe: Jeg talte nylig med en Mand, der bekræftede, at den samme Skik havde holdt sig paa de Steder, hvor der endnu lever nogle af de gode gamle Færinger, som Hr. Samuelsen talte om, der hvor de nye Skikke ikke er blevet herskende. Men iøvrigt synes jeg snart der maa være talt nok om denne Sag.

S. P. ár Kanoy: Eg vil geva Effersøe rætt í, at vit sum børn í heimunum hava hoyrt danskar sálmar og vísur; eisini í mínum heimi vóru tær sungnar. Men hví var tað? Tí foreldur okkara eingi annað úttu at syngja fyri okkum, sum prentað var. Men so skjótt sum tikið var til tað munnliga, til at siga sagur, forbolja sagnir, kvøðir kvaðir, so var alt á føroyskum. Og so skjótt sum føroyskar yrkingar vóru prentaðar, vóru tær alt í einum fólkaeyga, tær vunnu so ógviliga skjótt framum danskar. Donsk yrking, sum fyrr var nóg so vanlig í Føroyum, doyr út. Alt vísir, at Føroyingar tá teir skulu ástrykkja síni fólkslir, mugu leita til teirra egna mál — tað ber ikki til á donskum máli.

O. Effersøe: Nej, det var aldeles ikke blot gennem nogle Salmer og Viser, vi Børn lærte at elske Dansk, som Hr. Konoy vil redneere det til. Naar min Fader om Søndagen læste op for os af Prædikenbogen var det Dansk, vi lik at høre, og det samme var Tilfældet ved Gudstjenesten i Kirken. Det er altsaa dette Sprog, som har rørt ved det dybeste i os, som Hr. Konoy benægter skulde være fremmede Administrationssprog!

S. P. ár Kanoy: Danskt hevur ikki meira rætt í Føroyum enn eitt mál kann hava, sum er fort inn yvir okkum. Pápi mín nøjaðist ikki við at lesa prædikur fyri okkum, hann las eisini Saxo fyri okkum, á donskum — sjálvsagt. Men hvat bovísir tað? Einki uttan at her ongatíð av teim ráðandi er syrgt fyri at geva hesum fólki fatn nering í sínum egna máli, sum tað hevði brúk fyri eftir reformatiónina. Eitt studium er tað at læra at skilja eitt mál, tað næsta at duga at læra sínar fatkar fram í tí, hitt triðja má vist vera tað, at kunna vrkja í málinum. Føroyingar eru ongantíð kommir longur enn at forstanda danskt.

O. Effersøe: Nu forstaar jeg Hr. Konoy. Dansk er altsaa et fremmed Sprog, som er blevet ført ind over os, og som han altsaa ønsker snarest muligt at blive af med.

S. P. ár Kanoy: Effersøe hevur nokk fata meg, men hann sluttar skeivt. Vit vilja halda ta stoðu at føroysk børn skulu uppalast til at dugna at lesa og forstanda danskt, men hava føroyskt sum okkara egna mál.

A. Samuelsen: Viss vit skulu forteska diskussiónina, so vildi eg honstilla til formannin, at hann hevði sagt: «Bliv lyste! Eg havi natúrligvis eingi ímóti, at hann benyttar sína myndigheit til at hava okkum sifamuli her útá kvøldið, men so mikið hensýn kundi hann sjálvsagt vist okkum, at hann ikki læt okkum sita her í myrkri.

Skúladirektørarnir mugu vita av hvat grund ministeriið hevur sent okkum sakina aftur. Eg havi forlangað svar frá tí av løgtinginum valda limi av skúladirektiónini, og og bopi at fáa tað eintin av honum ella hinum limunum, men inntil tað komur, má eg royna at forstanda sjálvur, hvussu tað hongur saman við hesi sak, hví ministeriið hevur sent spursmálið aftur. Fleirtalið hevur sjálvt bavirkað, at spursmálið er aftursent. Teir hava sagt nakað so órímiligt sum tað, at føroysk børn bæði skulu læra føroyskt og danskt við føroyskum sum undirvísningsmál. Ministeriið forstendur ikki, hvussu vit skulu kunna uppnáa tað. Soleiðis forstandi eg sakina.

Skúladirektørin í Gøtu segði íáðni, at tað hevði staðið í donskum bløðum, at danskt var talumálið í Føroyum. Eg vil spyrja hann, í hvørjum donskum blað hetta hevur staðið. Kann direktørurin ikki svara mær uppá tað, so stempli eg hetta sum ein leysur pástandur, sum hann hevur tveitt út í tí treysti, at ogaar den, saa gaar den. Men hetta er ikki sannheit, og tað skal ikki sleppa at ganga fyri sannheit, fyrenn hann hevur nevnt tey bløðini, hvar tað hevur staðið. Kann hann ikki tað, skal hann stemplast sum ein, ið fer við leysari talu. Eitt deytt mál kallar direktørurin danskt mál í Føroyum. Tað er trist, viss direktørurin her hevur rætt. Tað hevur tó verið undirvísingarmál í Føroyum síðani 1912, ið hvussu er. Vil hann kanska pástanda, at lærararnir hava so fuldstendiga sett seg útyvir ta galdandi anordningina — man skuldi jú trú, at soleiðis var. Eg veit, at hann er formaður í lærarafelagnum — um so er, at hesin anordningur er settur tilsíðis, so átti felagsformaðurin Konoy syrgt fyri, at skúladirektørurin Konoy passaði uppá. Annars er jú eingin meining í tí heila. Men tað er kanska blivin skikkur nú, at lóg er lóg og lóg skal brótast? Eg haldi prógtin mátti protestera móti hr. Konoys pástandi: at danskt er eitt deytt mál; hann brúkar tað tó hvønn sunnudag á prædikastólinum. Vil hann kanska eisini pástanda, at tað er eitt deytt mál, hann prædikar? Ja, hetta er so samiliga ikki at grína at — hetta er eitt ógviliga alvorligt spursmál. — Vil prósturin pástanda, at tað mál, hann brúkar í kirkjuni, er eitt deytt mál? Hann má heldur niðurleggja sítt arbeiði, enn at arbeiða við einum deyðum máli. Og Konoy hevur í mong ár verið deknur við okkara fólkakirkju, so hann hevur eisini arbeitt við einum deyðum máli. Tað er trist, at tað skal kunna sigast á Føroya løgtingi, at danskt mál, sum hevur verið nýtt í okkara kirkjum, er eitt deytt mál. Og ein prestur situr og hoyrir hetta uttan at siga eitt orð ímóti tí. Tað er merkiligt, at hesir menn, sum hava hatta uppfatilsi vilja taka ansvarið fyri at standa í einum so týdningarmiklum arbeiði. Eg forstandi ikki, at teir vilja taka hetta ansvar uppá seg. Eg haldi ikki, at danskt mál er eitt deytt mál í Føroyum. Tað er her eitt livandi mál. Vit hava lært at seta prís á danskt mál og lært at elska tað. Og vit hava fingið nyttu burtur úr tí. Tað er trist, um hetta mál, sum Føroyingar mann eftir mann hava brúkt, skuldi vera eitt deytt mál, sum einki livandi skapti. Hetta havi eg følt trongd til at siga.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur miðvikudag 3. september.

Formaðurin las upp — — uttanfyri dagsordanin — soljóðandi bræv frá ingeniør Wadén:

p. t. Thorshavn, 3. Septbr. 1919.

Til
Færøernes Lagting.

Under Henvisning til det højtærede Lagtings velvillige Stilling til vort i sidste Vinter indgivne Andragende om Støtte fra Staten til Anlæg af 2 Elektricitetsværker i Vestmanhavn og Vaago, tillader man sig af følgende Grunde atter at gøre Tinget en Henvendelse i samme Hensende.

Folketingets Finansudvalg, til hvilket Sagen af Justitsministeriet er henvist, har stillet som Betingelse for, at Staten, som af Selskabet ønsket yder Garanti for en kalkuleret Anlægssum af ca. 2 000 000 Kr., at ogsaa samtlige Kommuner garanterer Omsætning af den Kraft, som de respektive Elektricitetsværker beregnes at kunne præstere, i alt ca. 3600 Hestekræfter, eller at Omsætningen paa Forhaand er sikret gennem privat Tegning af Abonnenter. Dette Forlangende har imidlertid vist sig vanskeligt at efterkomme, idet saavel Kommunerne i Særdelshed som Befolkningen i Almindelighed synes at have Betænkeligheder ved at paatage sig en Forpligtelse overfor et paa Færøerne saa ukendt Foretagende

som Drift af Elektricitetsværker endnu maa siges at være.

For dog at faa denne for den færøske Befolkning saa betydningsfulde Sag realiseret paa en for Almenheden tilfredsstillende Maade, skal man tillade sig at fremkomme med følgende Forslag til det højærede Lagting:

1. Det forbeholdes Koncessionshaverne forlods til eget Brug et Kvantum elektrisk Kraft af indtil 350 HK. fra Anlægget i Vestmanhavn for samme Pris pr. udnyttet HK., som Kommunernes Forbrugere yder for elektrisk Kraft. Resten overtages af Færøernes Amtskommune til Fordeling mellem de Kommuner, der maatte ønske at blive forsynet med elektrisk Kraft.

2. Den aarlige Pris pr. HK. til Forbrugerne bliver at fastsætte som Dækning af Totalsummen for følgende aarlige Udlæg:
   a. Forrentning og Amortisation af samtlige til Anlægenes Fuldførelse medgaaede Udgifter.
   b. Henlæggelse til Vedligeholdelse og uforudsete Udgifter.
   c. Administration.
   d. Den Sum, som ved Sammentælling af disse Udgiftsposter maatte fremkomme som aarlig Udgift, bliver at dække gennem en fastsat aarlig Pris pr. udnyttet HK.

3. Regnskabet, som revideres af 2 Revisorer, udnævnte henholdsvis af Justitsministeriet og Lagtinget, bliver at forelægge for et af Lagtinget nedsat Udvalg paa 3 Medlemmer, som derefter fastsætter Prisen pr. HK. Dette Udvalg skal ogsaa have Medbestemmelsesret i de i Stykke b. nævnte Henlæggelser.

4. Anlæggelse og Driften af de paagældende Elektricitetsværker føres som en selvstændig Virksomhed.

Da vi nu efter mange og store Anstrengelser er naaet saa vidt, at alt er klart til Arbejdernes hurtigste Paabegyndelse, skal man, udelukkende i Sagens Interesse, anmode det ærede Lagting som hele den færøske Befolknings Repræsentation om velvilligst at ville fremme Sagen hurtigst muligt i denne Samling paa det forannævnte Grundlag, der som enhver vil kunne se, ene og alene er baseret paa den færøske Befolknings Tarv.

Det er da ogsaa dette Hensyn, der har været bestemmende saavel for Statsgældsdirektør Andersen som mig, da vi besluttede at efterkomme den til os stillede Opfordring til at træde ind i Bestyrelsen for det Selskab, hvis Hovedformaal har været Realisationen af denne store og gode Opgave. Foruden os staar tilfige Hr. Kammeradvokat, Højesteretssagfører Vagn Andersen, København, rede til at tiltræde Bestyrelsen, der yderligere bliver suppleret med 4 agtede færøske Borgere.

I Æ Øebodlighed for Førova Handil- & Industri Partafelag paa egne og Statsgældsdirektør P. O. A. Andersens Vegne

Theodor Wedtø.

. . . . . .

Vegurin Havn — Vollhastað Kirkjubø.

1. viðgerð.

Nyholm Debess: Eg vil loyva mær at mæla til at hinda sak frá Havnar býráð verður vist til nevndina fyri øforskelligartaðe Sagere.

Hetta varð samtykt.

. . . . . .

Londistoð í Eiðisvík.

1. viðgerð.

. . .

Formaðurin: Det forekommer mig, at denne Sag kunde være indkommen i rette Tid, hvorfor det vilde være rimeligt, om vi overholdt den foreskrevne Frist og først tog Sagen for næste Aar. Der vil altsaa nu blive stemmet om, hvorvidt Sagen skal behandles i Aar. De Medlemmer, der stemmer herfor, vil behage at rejse sig.

(Tað varð samtykt).

J. M. Hatras: Hendla sakin er sum sagt so seint innkomin, at hon undir alminnaligum forholdum ikki átti at koma til behandling. Tað verður nokk heldur ikki nokur stór behandling av hár. tað liggur í sakins natúr. men eg vil tó siga nokur orð um hana.

Fyri o. u. 10 árum síðani var londingin í Eiðisvík útbetrað við studningi frá tingínum. Hetta hevur víst seg at hava havt nógv at týða fyri útiróðrarmonnum, men har vóru tó ymis brek, sum vit halda tað vera neyðugt at fáa bøtt.

Hvast á bátni í Eiðisvík, har bátarnir verða dregnir á land, er bara malagrót, so her ber ikki til annað, táið brim er, enn at ramma bátin á sjógv og so aftur draga hann upp, og tað má gerast ófora kvikliga, at

báturin ikki skal verða meinsháður í briminum. Sumantíl í víkini er ein hella, hvar vit plaga at tveita fiskin upp áðrenn bátarnir verðar drignir upp, men her er plássið solítið, at bert ein bátur sleppur framat ísenn. Tátil nú fleiri bátar koma aftur av útiróðri tætt aftaná annan ella kannska ísenn er tað sjálvandi at tað verður drúgligt at lenda. Í óvanda veðri kann tí skjótt ilt bersast á; ikki einans kunnu menn missa bæði bát og veiðu, men teir kunnu sjálvir ronkomast; helst er lusin vandi fyri hond um veturin, tá tað ræður um at fáa bjarga øllum, meðan somikið ljóst er. Tað verður so myrkt áðrenn allir eru liðugir, oftа vexur brimið ógvuliga knapliga, so tað kann vera vanskuligt at fáa bjargað bátarnar. Tað er eitt ógvuliga ringt stað at lenda; bátarnir mega dragast langan veg yvir malargrót, so teir noga hava hurrur liggjandi ið eru einar 5—6 alin til longdar. Tað er fyri at bøta um lesi ringu landiviðurskifti, at teir hava biðið um hetta. Forstandarskapið hevir forsømt at fáa hetta til tingið í rættari tíð; so hava nakrir interesseraðir fiskarar tikið seg saman fyri at fáa hetta brøv sent til tingið, og teir hava so hopað, at tingið vil taka væl undir hesum, sjálvt um tað er komið so seint. Teir meina, at tað var best, um bevillingin varð givin longu í ár, men um hetta ikki letur seg gera, at so tingið gevur lyfti um at geva ein bevilling seinni, og at tillidsmaðurin verður sendur norður at undirsøkja forholdini, so eitt yvirslag kann fyriliggja til næsta ár. Um vit einki gera nú, men bíða til sakin kemur aftur næsta ár, meina teir, at táið sakin ikki kann koma til umrøðu fyrr enn væl aftaná Ólavsøku, at so vil tað ár fara burtur ímillum og einki kann verða gjørt við sakina fyrr enn annað árið, tí árið verður tá so langt útliðið, at teir fáa ikki gjørt nakað stórvegis arbeiði fyri at springja hurtur undirvatnssker o. t.; teir hava víst á, at har kann skaffast størri pláss, so fleiri bátar kunnu leggja at í senn. Ég skal fyrisláa, at sakin verður víst til budgetútvalgið, og tað kann so siga, hvussu tingið atlar at stilla seg, so ikki næsta ár skal spillast fyri hesar menn.

S. P. úr Konoy: So vítt eg skilji tingmannin úr Norðuroyggjum, skal hetta altso ganga út uppá, at tingið skal geva játtan av peningi, utan at nakað er bevilgað og utan at tað fyriliggur nakað yvirslag. Skal hetta kunna fremjast áðrenn næstu tingsetu, so má tingið nú samtykkja pening, áðrenn álitismaður tingsins hevir kannað eftir, hvat ið er at gera og hvussu stórur kostnaðurin kann sigast at verða. Hetta vil vera ein nýggj praxis, og eg havi ikki góðar vónir um, at hetta kann setast í verk.

R. Rasmussen: Honda sak er komin nakað óvart inn á ting, og tað er tí ikki so gott knappliga at taka stoðu til hennara. Brævið frá hesum monnunum er komið inn nústaðni, langt aftaná tíðina. Tað hevir sjálvandi stóran týdning fyri Viðareiðisfólk at fáa lendingina í Eiðisvík gjørda góða og nýtiliga, tí har er meira enn torført at lenda, sum nú er. Tað er tí undarligt, at hesir menn ikki eru kommir so skjótt við teirra bonarbrævi, at tingið kundi haft sín álitismann har norðuri og fingið yvirslag longu í ár. Tað er ikki gjørt. Eg haldi, at vit skulu taka so væl ímóti hesari sak sum gjørligt er, utan at bróta gamlan tingskikk. Og eg vil bera upp á mál, at vit fáa tilført protokolini í dag, at anvið bemyndigast til at venda sær til forstandarskapið og fáa at vita tess støðu og senda álitismann tingsins norður, so alt kann koma at liggja greitt fyri til fyrstu tingsetu, antin hon nú verður ein eykatingseta í vetur ella hitt fyrsta ordinera tingið. Eg vænti ikki, at vit fáa nakað burtur úr, um sakin fer í útvalg, meira enn hetta. Tað vil óivað fara at kosta nógvan pening at fáa eina góða lendistøð har norðuri, plássið í Eiðisvík er ikki gott; so eg haldi ikki, at vit kunna binda okkum til nakað belop utan at tað fyriliggur eitt yvirslag. Táið vit gera soleiðis, sum eg havi borið upp á mál, hava vit strakt okkum so langt sum gjørligt, utan heilt at bróta við tingskikk í slíkum máhum.

J. M. Matras: Konoy sagði, at vit her vildu koma inn uppá eina nýggjan praxis; tað hevir lent fyrr, at tingið hevir givið pengar til, hvat ið er framanundan gjort, og tað er jú so, at tá ið arbeiðið er gjort, er tað greidligari at síggja, hvat tingið skal lata. Tað hevir eisini hent, at tingið hevir hakkað sítt tilskot til arbeiði, táið yvirslagið frá álitismonnunum hevir víst seg at vera ov lágt, og minnist eina sovorðna sak úr Sunuba. Til R. Rasmussen vil eg siga, at eg vil fyritrekkja útvalgsbehandling, og tað vilja óivað eisini teir menn, ið hava sent hetta brøv inn á ting; eg haldi, at vit skylda teimum tað og ikki eiga at vísa teimum eina slíka hán, sum R. Rasmussen fyrisker.

R. Rasmussen: Tað er beklagiligt, at tingmaðurin Matras leggur mítt uppskot út sum eina hán móti andragarunum, soleiðis kann tað aldeilis ikki uppfatast utan við nógvum illum vilja. Vit hava ofta fyrr brúkt protokoltilførslur ler á tingi, og eg vænti mær ikki meira burtur úr einari nevnd í hesari sak enn av einari protokoltilførslu. So er tað eisini tað, at vit einki vita um, hvussu forstandarskapið sær uppá sakina, tað má eisini upplýsast, áðrenn vit kunnu taka stoðu til sakina.

S. P. úr Kongi: Eg vóni, at tingmaðurin Matras ikki uppfatar mær soleiðis, at eg ikki vil, at nakað skal vera gjørt við hesa sak, men eg framhelt, at hon var komin ov seint til, at vit kunnu bovilga nakað í ár, utan at broyta gamlan tingskikk. So er tað eisini tað, at henda sak hevir ikki verið fyriløgd kommunustýrinum, so tað má í hvussu er hava hana at útbala seg um, áðrenn vit kunnu gera nakað við hana, tí her verða stórar útreislur, og tann størsta byrðan má sjálvsagt falla á sókuina. Men tað kann kanska upplýsast í einum telefontelegrammi. Eg vil ikki lata tað sita á mær, at eg ikki skuldi vilja fremja hotta; men hatta er ein nýggj praxis, at tingið skal geva eina bevilling eftir einum brævi frá privatmonnum, utan at nakað yviralag fyriliggur, og utan at sóknarstýrið er spurt.

J. M. Matras: Eg havi eisini saknað hetta, men um sakin kemur í eitt útvalg, kunnu vit lætt fáa telefontelegram frá forstandarskapinum um, hvussu tað sær uppá sakini; at teir vilja anbefalla hana, veit eg. Annars søgdu hesir menn norðuri á Viðareiði, ið hava skrivað hetta brævið, at teir væntaðu, at forstandarskapið eisini vildi skriva til løgtingið; tað hava teir altso ikki gjørt.

A. Samuelsen: Eg vil siga, at eg, eins og hinir sambandsmennirnir, vil stemma fyri tí uppskoti, ið er framsett af Matras. Eg haldi tað vera beint, at sakin fer í útvalg, og ikki, at vit, sum R. Rasmussen fyrisløgur, noyast við eina tilførslu til protokollina. Eg gangi út frá, at figgjarnevndin verður líka so skjótt liðug við sítt arbeiði, sum aðrar nevndir. Eg yvirlaga, at hendan sakin verður send í nevnd.

R Rasmussen: Eg vil siga við Matras, at tað tykist at vera so, at tað ikki er gott samarbeiði millum forstandarskapið og teir, sum hava sent andragandi. Tað er lítil grund til at taka sakina í nevnd fyrr vit hava eitt úttalilsi frá forstandarskapinum.

J. M. Matras: R. Rasmusson hevur nú fingið so nógvar beteinkiligheitir. Hann skuldar, at lað er óyvireinst millum hesar menn og forstandarskapið; men hann misskilur mog. Tað er meint soleiðis, at hesar nógvu undirskriftirnar skulu styrkja andragandið. Forstandarskapið kann hava hildið, at sakin var ov seint á veg, og so hava hesir menninir ikki viljað givist.

Formaðurin: Der er Forslag om, at der tilføres Protokollen, at Forslaget udsættes til næste Aar.

Hetta uppskotið fekk 10 steimmur og varð soleiðis ikki samtykt.

Síðani kom uppskotið um, at sakin beinist í figgjarnevndina.

Hetta varð samtykt.

Viðurskifti viðv. „Smirli".

2. viðgerð.

R. Nielsen (ráðsmaður) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá, at tingið gevur vørunevndini játtilsi til at forhandla við mannskapið á „Smirila og fastseta teirra løn, og at yvirdraga til Edw. Mortensen administratiónina av Smiril, at lata vørunevndina áseta Smirils fartplan, og at takstirnar fyri ferðafólk og góðs vera hæðkaðnar.

A. Samuelsen: Eg skal nevna nakað lítið um tað, sum ikki all nevndin — ikki J. Rasmusser og eg — kann ainast um. J. Rasmussen og eg hava einki ímóti, at vit lata administratiónina til hana mann, sum her er talan um. Tó vilja vit, at tað verður innsett í forslagið tað peningabelopið, sum hesin maður skal hava í løn. Hetta koma vit vist ásamt um í nevndini, tá vit talast saman aftur um tað. Eg gangi út frá, at hendan sok fer til 3. viðgerð, tí hon dreyar seg um pening. J. Rasmussen og eg vilja ikki hækka takstirnar á Smirli. Tað er jú ikki langt síðani, at tær vóru hækkaðar. Tað kann vera, at vinsar grupnur av vorum ikki eru soleiðis í prísi sum í sínari

tíð. Ymsar varur eru blivnar bíligari, kanske nakrar dýrari, og eg haldi, at tað to ikki av hesi grund er vert at hækka varurnar yvirhovur. Tað nýtist vist heldur ikki í eygablikkinum. Eg haldi tað ikki vera vert at hækka taxtirnar yvirhovur; so vítt eg forstandi, meinar man, at vit kunnu standa okkum við ta frakt, vit hava nú, og passagertaxtirnar eru óivað hogar nokk. Vit kunnu lata Smiril sigla eitt ár enn og so síggja, um vit noyðast at hækka taxtirnar. Eg vil ikki ráða til at stemma fyri uppskotinum frá fleirtalinum um at hækka við tað sama.

R. Nielasen: Eg forstandi ikki, hví Andrass Sámalsson ikki vil hækka taxtirnar í forhold til kostnaðin av teim vørum, ið flytast við Smirli. Vit vilja ikki fáa nakað yvirskot av Smirli; sjálvt um vit hava haft meir inntøku frá apríl, so hava vit nú so nógv størri útreiskur, at tað ikki er vón til at vit hava nakað yvirskot, táið árið er úti, og tí haldi eg tað ikki vera beint at lata Smiril sigla, og so, táið árið er farið, at vera noyddir at líkna til amtsrepartitiónsfondina fyri at dekka undirskotið. Utreiðurnar eru nú so nógv størri enn táið Mortenson hevði Smiril. Vit høvdu ikki nógvan hug til at keypa netupp tí, at driftin var so dýr, og vit sóu, at hon vildi verða enn dýrari; tí vildu vit hava Mortensen at royna at fortseta driftina, og táið teir ikki vildu, noyddust vit at keypa. Men vit mega tá royna at fáa Smiril at bera seg Tað kann ikki sigast, at passagertaxtirnar eru ov hogar; man kann sigla úr Miðvági til Havnar fyri 4 kr.; um man varð noyddur til at taka motorbát t. d., vildi tað kosta einar 60—70 kr., so sjálvt um tað gjaldið frá Miðvági til Havnar fór upp í 6 kr., vildi eingin tala ímóti tí. Vit mega ansa okkum fyri, at Smiril ikki kemur til at tarna okkum við at sigla við undirskoti.

J. Samuelsen: Sjálvsagt vil eg ikki, at Smiril skal vera okkum ein verri kleppur, enn hann eigir at vera, tað er ikki nodvendigt, at hann skal geva undirskot. Hovuðssakin við Smiril er at flyta varu fyri amtskommunonа; skuldi tað so vist seg, at tað ikki betalir seg at flyta varurnar fyri hesar taxtir, so kunnu vit altíð hækka tær tá, tað er eitki, ið talar fyri, at vit eiga at hækka taxtirnar, áðrenn tað er nodvendigt. Tað er ein so stór forrætning í Tinganesi, at eitki er at ivast í, at hon vil kunna halda hetta gangandi. R. Nielsen talar um passagertaxtir; ja, tað er ikki at ivast í, at R. Nielsen er nógv meira vardur enn eg, hann lovrir já til fleirtalið, og táið hann siglir við Smirli, er tað tí ikki meira enn bíligt, at hann, ið er meira vardur, betalir meira; men tað kann vel latu seg ordna, at vit fáa settar taxtir eftir hvat passagerarnir eru vardir. At vit skulu noyðast at hækka taxtirnar nú, kann eg ikki síggja. Tinganes vil kunna klára driftina av Smirli, tað ivist eg ikki í.

R. Nielasen: Eg skal bert minna á, hvat A. Sámalsson segði táið vokonomisk statusa var til viðgerðar: »Vit mega allarceiða í ár líkna til amtsrepartitiónsfondina fyri at dekka undirskotið av Smirli«; her sigir hann nakað heilt tvørtur ímóti. Smiril var deils keyptur fyri at flyta vøre fyri landsbandilin, men eisini fyri yvirhovur at kunna hava samband millum oyggjarnar. Man kann ikki trúgva, at A. Sámalsson her fjalir sína innastu meining og í virkuligheitini er samsintur við mær í, at tað er noyðsynt at hækka taxtirnar, um Smiril skal bera seg, meðan at hann sigir nakað tvørtur ímóti. Alt Føroya fólk er interesserað í at fáa Smiril til at standa seg sjálvan.

A. Samuelsen: Eg havi hoyrt tað fyrr her á tingi, at Smiril kann standa seg við teim taxtum, vit hava nú, sjálvstýrismenn hava sjálvir hildið tað fram her í salinum í ár. Eg rokni uppá tann máta, at Smiril má sjalvur svara rentu og avdrag, tann hann skal svara seg, men at vit ikki skulu tjena pengar uppá driftina. Um sjálvstýrismenn, táið teir keyptu Smiril, hava ætlað at brúka hann til at sanka í lødu, so verður tað tairra sak.

V. Debess: Eg vil longu við hesa viðgerð siga frá mínari stoðu til hesa sak. Eg tori ikki at fylgja A. Samuelsen. Tað eru nógvar grundir til at hækka taxtirnar á Smirli, men alt-at teimum ið hava verið er komin ein spildurnýggj grund, nevnliga at mannskipanin skal hava meiri løn. Tað er eitki at siga til tess, men kostnaðurin við hesi lønhækkan verður einar 10.000 kr., og um ikki verður ansað eftir at skaffa tær, so tær verða í undirbalanen naesta ár, so trúgvi eg fyri víst, at A. Samuelsen tá vil koma fram og kritisera tað, ikki minna enn hann nú kritiserar tað at vilja hækka taxtirnar.

R. Nielasen: Eg trúgvi, at A. Sámalsson nú minnast skeivt; eg havi ikki hoyrt annað sagt her á tingi, enn at Smiril kundi standa seg við teim gomlu ratum, táið

verð fyritikin vissar forandringar við vørunum. Tað kann vera, at har verður eitt lítið yvirskot, men man eigir at vera sikkur í, at einki undirskot verður.

A. Samuelsen: Nyholm Debess kom við einari spildurnýggjari grund til bakkan, við tað, at hann nevndi eitt krav frá mannskapinum um at fáa meiri løn, tað vistu vit ikki frammanundan. Eg gangi út frá, at hann meinar, at vit skulu imøtuganga hesum kravi og betala leninar um tað er so, so verður tað ikki meira enn, at eg tori seta meg ímóti hesari bakkan. Men eg veit, at hesar 10.000 kr. mega vit kunna fáa úr Tinganesi, har skal jú vera eitt fitt yvirskot, og eg hopi ikki, at R. Nielsen før administrerað alt hurtar hetta árið, og tað er ikki meira enn bíligt, at Tinganeshandilin og Smiril, ið hoyra so nær saman, styðja hvørt annað. Nú kann R. Nielsen siga, tað var ikki bert fyri varuhandilin, at løgtingið gav vørumótvalginum bemyndigilsi til at keypa Smiril. Um teir hava keypt hann í aðrari hensigt, veit eg ikki. Um Nyholm Debess meinar, at eg arbeiði fyri at fáa ringt úrslit úr hesum í ár, fyri at kunna agitera við tí til næsta ár, so líkist tað akkurat honum at have sovorðna hugsan, og eg gratuleri teir, ið hava uppdrigið Nyholm Debess til at ganga runt í tinginum við hesum tankagangi.

N. Debess: Eg skal ikki hefta meg við hatta seinasta. Annars segði A. Samuelsen, at vøruhandilin og Smiril áttu at hjálpast at, tí tey hoyra so nær saman, og vildi helst hava Smiril at bera seg fyri seg og vøruhandilin fyri sog. Tað undrar meg annars, at A. Samuelsen nú roknar soleiðis við vøruhandlinum, tí fyri fáum døgum síðani framhelt hann, at handilin sum skjótast átti at verða avtikin. Andrass Sámalsson roknar við, at handilin framvegis skal geva sonn inntøkur, sum hann hevur haft. Tað rokni eg ikki við. Roknskapurin sýnir at har er brúktur nógvur peningur til avvikling.

A. Samuelsen: Nei, eg rokni sjálvsagt eisini við, at vit skulu avvikla, og eg forstandi væl, at tað nýtist ein tíð til tað. Men tað er jú Nyholm Debess, sum roknar við, at handilin skal fortseta; hann er jú í fleirtali her á tingi, og eg gangi útfrá, at hann eisini hevur fleirtalið við sær í hesum. Eg eri ímóti tí. Hvussu leingi handilin skal drívast, veit eg ikki, men tað er skiligt, at tann beholdningur, vit hava, skal forast út. Eisini má tað vera øllum skiligt, at størsti parturin, vit kunnu vænta at koma inn av fraktum til Smirila, má koma gjognum vøruforsýningina. — Eg dugi ikki at siggja, at vit nýta at ganga tann vegin, fleirtalið fyrisiar, utan fyri personfaxtir, tað verður ganska óbetýðiligt, vit kunnu rokna við av vørum ufan frá Tinganesi. — Sakin skal jú til 3. behandling, og her er altso nakað nýtt komið fram frá Nyholm Debess. Eg skal viðganga, at hann her hevur funnið eitt gullkorn, sjálvt um hann er nakað dapurskygdur.

N. Debess: Eg skal ikki úttala meg um, hvør ið meira dapurskygdur er; Andrass Sámalsson ella eg. Men eg haldi tað vera undarligt, at hann ikki kemnir viðurskiftini innanfyri tá nevnd, hann situr í.

A. Samuelsen: Eg veit ikki, hvat Nyholm Debess siktar til. Tað er kannska eitt ella annað, hansara partífelagar ikki hava undirrættað meg um, tað kenni eg ikki. Veri hann so góður at siga, hvat tað er.

N. Debess: Andrass Sámalssons úttalilsir idag prógva tað.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur hósdag 4. september.

Studningur til E. Hansgaard.

2. viðgerð.

J. H. Poulsen: Eg skal mæla til at stemma fyri nevndaruppskotinum.

O. Effersøe: Der er i Forslagene ingen væsentlig Forskel mellem Flertallet og Mindretallet i Udvalget. Der er kun Forskel i Motiverne, men jeg skal dog ikke komme ind her paa.

R. Rasmussen: Okkum tinst ikki, at tað skal vera óumtalað, soleiðis sum hendan sak er viðfarin av administratiónini. Her er ein ungur Føroyingur, sum fer til Noregs at fáa sær mentun í jarðarrokt og sókir sær studning, soleiðis sum fleiri slíkir menn hava fingið undan hesum. Men tað vísir seg, at hesa ferð gongur tað ikki so glatt. Hvussu sakin hevur verið umfarin

av forstandarskapinum í Gotu og av sýslumanninum í Eysturoy, tað skal eg ikki nerta við. Men viðkomandi fær skrivilsi frá ministarinum, hvarí ministarin spyr, við hvorji eotlan hann sokir útdanmilsi. Hesin maður sýnist at søkja útdannilsi við útskiftning í Foroyum fyri oyga. Og av einum brevi frá landbúnar skúlanum í Keypmannahavn frangongur, at hann ikki kann fáa embæti sum embætismaður, landinspektorur, utan hann tekur prógv við hendan skúla. Vit hava tó eitt fortilfeldi við landbrúkskonsulentinum. Hann hevur ikki eksamen frá landbuhúskulanum. Hesin maður, sum hon er talan um, skuldi so eisini kunna fingið embæti á sama hátt. Men soleiðis meina menn ikki nú. Og sakin er harav dýggjað, so at E. Husgaard ongan studna hevur fingið, tó hann hovir rætt til tað eins væl sum aðrir. Og tað so mikið meir, sum útlæstið til útskiftingarlógina bert enn er eitt uppskot um, at maðurin skal vera landinspektorur. Tað mátti einki vera í vegin fyri, at maðurin fær sítt útdannilsi í Noreg, hvar praktisk útskifting finnur stað tann dag í dag, men ikki finnur stað í Danmark í tann mun. Tað er eingin praktisk, men bert teoretisk grund til at páhalda, at hesin maður skal hava eksamen frá landboháskúlanum.

S. P. úr Konoy: Eg vil stilla eina spurning til Patursson, tí hann hevur gingið somu leið, sum hesin maður. E. Husgaard var 1½ ár á Stend og sokti studna frá Danmark, men fekk ongan. Hevur Patursson fingið studna á Stend? Og seinni á Aas? Er nú skelt tað systemskifti, at menn ikki longur fær studna, um tann lærir í Noreg? Tað er kodiligt, at ein ungur maður, sum er ágrýtin at lera, og sum eisini hevur gjørt nógv heima á sínum gardi, nú ikki skal kunna hjálpast.

J. Patursson: Tað liggur beint fyri at svara á spurningin frá síðsta rodara. Í 1881 bað táðir mín tann táverandi umboðsmann um at spyrja kongaliga landhusholdningsselskabet, hvar ungir Foroyingar áttu at lera jarðarbruk. Umboðsmaðurin segði, at landhusholdningsselskabet hevði svarað sær aftur, at ungir Foroyingar áttu at fara til Noregs at lera, og at landhusholdningsselskabet vístu á, at Íslendingar hevdu havt góða nytti av tí. Nú tykist landhusholdningsselskabet at hava aðra stoðu. Eg var í 2 ár á Stend og vann kostaðar heiman frá. Fimm ár eftirá á fór eg á Aas. Tá og hevði verið har 1½ ár, sokti eg innanríksministeriið um studning. Eg hevði onga anbefalling úr Foroyum og eg skrivaði til ministeriið, at um teir vendu sær til autoritoturnar har, so fingu teir eingi anbefallandi orð frá teimum. Men eg fekk studna kortini. Eg hevði anbefalling frá mínum lærarum í Noreg. Seinni fekk eg eisini studna til eina kanningarferð til ymsu pláss í Noreg. Viðvíkjandi landbrúkskonsulentinum, so gekk hann á mínum skúla í Kirkjubø, sum ikki altíð hevur verið væl umtalaður av mótstoðumonnum. Men tann eksamin, hann fekk hjá mær gjørdi, at hann kundi koma á tann hagnu skúladeildina á Aas. Hann sokti um studning frá ministeriinum til sítt uppihald har, og hann fekk tað. Og nú er hann hægsti maður at standa fyri jarðarbrúkinum í Foroyum. Og aðrir Foroyingar, sum hava verið í Noreg og lært, hava vist eisini fingið studna. Ja, tað sær út, sum tað er hent eitt systemskifti. Og tað er harmiligt. Tí tað, sum landhusholdningsselskapið segði í 1881, tað er beint.

Joen Paulsen: Naar Konoy sigur, at det ikke er godt at vide, hvad der har staaet i Skrivelsen fra Landbohøjskolen, fordi der i Afskriften er udeladt noget, der er gengivet ved Prikker, saa skal jeg bemærke, at der er mange officielle Skrivelser, der, ligesom private, begynder med en Indledning, saa omhandles selve Sagen og ender med en Slutning, og denne har i dette Tilfælde ikke haft Interesse for selve Sagen og er derfor udeladt i Afskriften.

O. Effersøe: Vi ser, at Andrageren, Elias Husgaard, er utilfreds, og at her i Tinget er der ogsaa Medlemmer, der er utilfredse. Det blev sagt, at de utilfredse altid har Ret, jeg tror det nu ikke i Almindelighed, og i dette Tilfælde tror jeg det heller ikke. Der blev fremhævet, at der her havde fundet et Systemskifte Sted, det tror jeg ikke. Der blev i min Tid af Statens Midler ydet Tilskud til unge Mænd, der vilde lære Landbrug i Norge. Men kan man da ikke laa det længere? Jeg tror jo, for det her er et helt andet Forhold. Her er det en Mand, der søger Uddannelse i Norge, ikke i Landbrug, men til Landmaaler, eller for at bruge et finere Udtryk, som det synes at være Tendens til at bruge nu i Tiden, til Landinspektør. Sagen er jo langt fra endelig afgjort. Man maa her spørge: hvad skal Mandon bruge sine Kundskaber til, hvis vi Brug for dem? Hertil svarer Mandon: Jeg mener ikke at stille mig til Disposition for Landbrugere paa Færøerne i deres praktiske Erhverv,

men han ønsker ligefrem at være leder af den Udskiftning, der skal finde Sted efter de foreslaaede ny Landbolove. Her er det selvfølgeligt, at Regeringen maa tænke sig godt om. Spørgsmaalet har været forelagt Professorerne paa Landbohøjskolen, og de har svaret, at til det Hverv maa Mandom have en god Uddannelse, svarende til Landinspektør, og at han maa sætte sig ind i visse Forhold i Norge. Landbokommissionen har jo netop forlangt en Landinspektør til dette Hverv, og det er forstaaeligt, at Landbohøjskolens Professorer ikke vil stille ringere Krav. Jeg vil trække mit Forslag tilbage, da det svarer til Flertallets.

J. Patursson: Effersoe segði, at tað er ikki avgjort, at hesin maður ongan stuðning kann fáa, ju, tað er rætt; men løgtingið má kunna útbala seg um henda spurning og lata víkistýrið vita sína støðu. Tá ein maður, sum hesin, skal bíða í 2 ár eftir at fáa stuðning, so verður torført fyri ungar Føroyingar at útdanna seg í fremmandum londum. Annars kunnu professorar á landbúháskulanum í Keypmannahavn ikki meina, at nemingarnir á landbúháskúlanum í Noregi ikki fáa líka gott útdannilsi sum í Keypmannahavn. Eg meini ikki, at tað er beint at hefta seg við orðið landinspektør, soleiðis at maðurin ikki skal kunna lera í Noregi, tí tað var jú netupp tað, bónaðarnevndin meinti, at tann maður, ið skuldi standa fyri útskiftingini, skuldi hava sett seg inn í norsk viðurskifti, og tað var ikki bert Føroyingarnir í nevndini, ið meintu tað, men eisini fávarandi sorinskrivari Helms, ið var ein góður danskur maður.

J. H. Poulsen: Effersoe nevndi, at tað var sagt, at teir ótilfredsu altíð hevdu rætt; nei, og segði sína ferð: sleve de ótilfredsele og tað man vera nakað um tað. Hesin maður hevir grund til at vera ótilfreds. Effersoe hevir tikið sítt uppskot tilbaka; tað stendur í hansara uppskoti í punkt 2, at andragarin skal fáa úrskrift av samtyktini, tað stendur einki harum í okkara uppskoti, og eg vil tí spyrja amtmannin, um tað er nødvendigt nú hansetu serligt uppskot nú hetta ella um tað verður samtykt saman við fleirtalsins uppskoti.

J. Naundrup: Eg hoyri hvørki til fleirtalið ella minnitalið, og kundi stemma fyri báðum uppskotunum, men eftir hvat J. H. Poulsen segði, má eg halda, at Effersoes uppskot hevir verið tað betra. Eg skal siga eini tvey orð til, hvat ið varð sagt um, at her skuldi hava verið eitt systemskifti. Eg kann ikki trúgvi, at tað er so. Í 1914—15 skaffaði eg soni Olavs á Heygum stuðning til at fara til Noregs og læra landbrúk. Og tað hevir verið langt aftur í tíðina, at Føroyingar hava fingið stuðning til at fara til Noregs, soleiðis hevir gamli sýslumaður Olsen upplýst, at hann, táið hann var fólkatingsmaður, skaffaði Jóannes Patursson neyðturviligan stuðning til at fara til Noregs, tað er best, at sannheitin kemur fram, sýslumaður Olsen hevir sjálvur upplýst hetta í einum blaði heruppi. Men hetta er nakað heilt annað. Hesin maður er ikki farin til Noregs fyri at lura landbrúk. Táið sakin er rekt út, so er tað tí, at maðurin sigur seg at vilja útdannast til ein embætismann ella bestillingsmann, útdannilsi í landbrúki hevir hann framumundan so gott sum aðrir menn hava tað heruppi. Men hetta nýggja spursmál má krevja meiri undirsøkilsi, man má krevja fleiri attestir, og man má vel siga við hann, at hann kann ikki fáa stillingin, tí hann hevir ikki tá examin, ið krevst av landbokommissiónini. Hon kravdi ein landinspektør, og so má tá eisini ein professari á landbuháskúlanum trúgva, at regeringin kann ikki krevja minni, og hví skal man taka ein mann við minni útlendskari examin, táið tingið krevur eina storri. Her er einki systemskifti, eg eri aldeilis vísur í, at Føroyingar eru sum áður kunnu fara til Noregs at útdannast í jarðabrúki og fáa stuðning til tess. Men í hesum tilfelli kann hesin maður ikki fáa hetta umbætið, um tað verður lóg, sum landbokommissiónin hevir innstillað; tað kann í hvussu er ikki teinkjast, at sjálvstýrismenn vilja brøyta hetta, teir hava altíð úttalað seg um, hvussu gott hetta uppskot frá landbokommissiónini er. Eg trúgvi ikki upp á nakað systemskifti her; Føroyingar fara eru sum fyrr at fáa stuðning frá landbrúksministeriinum til útdannilsi við norskar skúlar. Teir stuðningar, sum givnir eru, hava tó ikki verið so stórir sum talan er um her; men eg skal gjarna innrømma, at tað er nødvendugt fyri hann at fáa hesa hjálp til at rokka teir umkostningar, ið krevjast til eitt so langt upphald við hendan norska skúlan.

J. Patursson: Andreass Samuelssons rættleiðing til mín fádni var ikki hein. Eg segði, at eg hét ministerið vita av, at eg ikki hevði viðmæli frá autoritetunum, og tí sendi eg umsóku mína einsamans við tí

viðmæli, og hevði frá skúlanum, og hevði gingið á. Andrass Sámalsson veit væl, at tað hvørt ár verður — og var — givið ein vissur peningasummur — 5000 kr. hugsi eg, til landsmonn at læra fyri í útlondum. Tað var hesin studningur, og søkti og tíl tess hevði eg nýtt at liðja sýslumann Olsen um stuðul; eg minnist ikki, um eg gjørdi tað, men eg vil als ikki nokta fyri tí....

A. Samuelsen: Jú fyri guds skyld, nokta undiliga!

J. Patursson: Tað er tó ein merkiligur máti, Andrass Sámalsson hevur, at falla øðrum tingmonnum í taluna, og tað við orðum, sum absolut ikki hoyra heima í parlamentariskum lívi. Hann mátti tó hafi lært so trøgan fólkaskikk, somikið hann hevur verið frammi í offentligum lívi, at hann hevði vant seg av við slíkt, men tað tykist ikki at rína við hann. - - Viðvíkjandi tí at hesin drongur biður um studning til at sota sag inn í eina vissa lærugrein á tí norska landbúskúlanum, skal eg siga, at tað harvið ikki er sagt, at hann bara fer at læra útskiftning í Føroyum. Hann hevur jú ein stórum bóndagarð, sum honum stendur í boði, at taka til, og tað er tí ikki burturspiltur peningur, um staðurin veitir honum honda studning, tí hann lærir so mangt annað har, sum kann koma honum til góðar í hansara bóndabrúki. Tað er mín meining, at hetta átti ikki at verið drigið so leingi út; landhúshaldingsselskapið hevur, sum tey siga fyrigrijið hesa sak, í tí teir siga: Tít fært eingi, tí tú ætlar tær at vera fyristoðumaður í Føroyum fyri útskifting, og har kann eingin annar verða utan landinspektorin; teir rokna her við einum *uppskoti* frá bóndaarnevndini, sum ongatíð er vorðið lóg!

S. P. úr Kongi: Eg eri aldeilis bilsin at hoyra, at tað eru teir menninir, vit sendu niður á ríkisdagin, sum siga seg at hava givið undirstyttilsir bæði til eitt og annað. Hetta er mær ófatanligt. Eg veit ikki betur, enn at bondarørsla verða stillað til tey ymsiska ministerir, at tað er administrationin, ið hevur við slíkt at gera. Nú hoyri og tingmenninir frá Føroyum siga, at vit hava givið styrk. Má og spyrja: ganga administrationin og ríkisdagsmenninir soleiðis út í eitt? Eg veit ikki at skilja millum hesi begrepini eftir tí, eg nú havi hoyrt, men mær dámar ongatíð ein slíkan skurblanding, og tí haldieg tað vera nøvdugt, um tað er, sum teir siga: at fáa skil á hesum. Tí set, at vit fáa ein fólkatingsmann, sum hevur sína styrki í tí at venda ollum við, seta alt á høvdið!

Kåre Mortensen: Eg skal loyva mær at lesa upp tvey punktir í landbokommissiónsálitinum, har tað framgongur, at kommissiónin hevur lagt vekt uppá tað tekniska útdanmilsi og gongur útfrá, at tað skal fáast í Noreg. Tann maður, sum skal standa fyri útskiftingini her, má hava útdanmilsi í Noreg. hann fær ikki tann praktiska kunnleikan í Danmark, sum krevst. har eru ikki tey problemini, sum vit hava við at gera. Eitt annað er spursmálið um, at hann aftrat útdanmilsinum í Noreg skal hava landinspektør-examin. Tað er óivað vert at lugsa um, hvørvitt vit ikki áttu at sletta hetta um landinspektorin í uppskotinum frá kommissiónini og einans siga, at fað skal vera ein maður við tí nevðvendugu teknisku innsikt.

§ 8 ljóðar so: »Som Formand for Kommissionen foreslaar man en af Justitsministeriet beskikket Landinspektor. Dette er i Overensstemmelse med den i Norge som i andre Lande, hvor Udskiftningen endnu er i fuld Gang, gældende Ordning, hvorefter en af det offentlige beskikket teknisk uddannet Mand er Formand for Udskiftningsmyndigheden; men medens man i de nævnte Lande, paa Grund af de store Udskiftninger, der foregaar, har *fast* ansatte Mænd (i Norge benævnt »Udskiftningsformænd«) bliver det i alt Fald forelobig for Færøernes Vedkommende nødvendigt at beskikke en Formand i hvert enkelt Tilfælde, hvor der bliver Brug for en saadan. Med Hensyn til den paagældende Teknikers Egenskaber finder Kommissionen Anledning til at fremhæve, at man anser det at være af stor Betydning for hele den færøske Udskiftningssags Fremme, at der træffes et heldigt Valg af vedkommende Tekniker, saaledes at denne ikke blot er i Besiddelse af den almindelige formodne faglige Uddannelse, men ogsaa har haft Lejlighed til at delfage i Udskiftninger under lignende Forhold som de færøske.«

Honda kunnleika kann maðurin einans fáa við at fara til Noregs.

O. Effersøe: De Oplysninger, Hr. Mortensen fremkom med, kendte vi; det samme foreligger jo fra Landbohøjskolen. Men der er saa Spørgsmaalet om den fagmæssige Uddannelse, og der har jeg i Betænkningen henvist til, at jeg intet Kendskab har til den norske Skole om, hvorvidt dens Under-

visning er fyldestgørende i saa Henseende. Det er meget sandsynligt, at den er det, men jeg ved det ikke. Som Følge deraf har jeg ikke kunnet tage Stilling til Spørgsmaalet. Jeg har nøjedes med at henvise til, at den Person, der skal lede Udskiftningsvæsenet paa Færøerne, maa have den almindelige faglige Uddannelse, der kræves af en Landinspektør.

J. Patursson: Landbúháskúlin í Keypmannahavn er ógviliga væl kunnugur við, hvat landbúháskúlin í Kristiania kann prestera; har eru akkurat líka so væl útdannaðir menn sum í Kjøpinhavn. Eg hoyrdi onnká sagt harniðri, at tað yvirhøvur var nógv meira krevt av næmingum við Aas enn í Kjøpinhavn. Um Effersøe ikki sjálvur veit um hetta, so átti hann haft fingið sær tað at vita.

O. Effersøe: Jeg har ikke haft nogen Udtalelser at holde mig til fra Autoriteter, jeg kunde stole paa.

J. Patursson: Tað er Effersøes egni feilur.

A. Samuelsen: Eg veit einki um, at ríksdagsmenn hava pástaið at hava givið styrk sum Konoy fortelur. Eg vil gjarna spyrja Effersøe, um hann vil viðganga at hava sagt tað, at hann hevur givið studning úr tí danska statskassanum. Tingmaðurin úr Gøtu citerar ofta so, at tann, sum citeraður verður, ikki kennist við tað. — Til Patursson vil eg siga, at tað er nógso keðiligt, at hann skal hava gloymt, at sýslumann Olsen skaffaði honum statsstudning; eg kann altíð vísa honum svart uppá hvítt fyri tað. Táið man betoinkir, at Patursson ikki aleina ikki kundi framleggja eina einasta anbefaling, men onntá segði, at hann onga kundi fáa herheima í Føroyum, hvar hann tó var bost kendur, so má tað nærmast kallast eitt royndi av sýslumanni Olsen, at hann tó fekk honum studningin. Ganska víst hevði Olsen grund til at angra tað seinri.

O. Effersøe: Det følger af sig selv, at jeg hverken har sagt eller har givet Indtrykket af noget, der kunde tydes i Retning af det, som Hr. Konoy har anført.

S. P. úr Konoy: Tað er tó merkvendugt við hesum tingmonnunum. Hava teir ikki háðir nýliga staðið og róst sær av at hava skaffa studningar frá statskassanum! Og nú nokta teir fyri tí. Men annans gloðir tað meg sjálvsagt, at tingmenn einki hava við hetta at gera.

A. Samuelsen: Sjálvt um Konoy royndi at vera behendigur til at sleppa sær burtur úr, so hevur tað ikki lukkast honum. Hann sigir, at tað er sagt, at vit hava givið nonnum studning. Tað er ikke sagt her inni. Nú roynir Konoy at skava út yvir, eins sum eitt víst djór.

O. Effersøe: Nu kommer Konoy længere ud. Han fortæller, at jeg og ogsaa A. Samuelsen har rost os af noget. Jeg har slet ikke rost mig. Jeg sagde, at jeg tidligere, da jeg var Rigsdagsmand, havde været med til at give Understøttelse til Mænd, som havde været i Norge og lært Landbrug.

S. P. úr Konoy: Eg vóni, at uppritið kann siga, hvat tit so væl sum eg hava sagt. Effersøe sigir, at hann ikki hevur rósað sær. Nei, mann skal heldur ikki rósa sær sjálvur.

J. Patursson: Hetta lítla tjakið er ikki bert persónligt. Her er spurningur um, hvat okkara ríksdagsmenn hava ávirkan á. Tað er frá Effersøe og frá A. Samuelsen framhildið, at ríksdagsmenn hava skaffað nonnum studna. Tað má so hava nógv at siga, um hesir menn eru partískir. Tí má hugsast um hetta tá vit fáa eina kommissión, um tað er beint, at tað skal avhenga av okkara ríksdagsmonnum, um Føroyingar skulu fáa studna alla ikki. Eg minnist væl, at Olsen hevur róst sær av, at hann hevur *skaffað* mær studning. Hin trætingarsami A. Samuelsen sigir, at eg skal hava skrivað í hefti, sum ríksdagsbureauet gav út, at eg var eigari av Kirkjubogarði. So spyr hann, nær tað var. Tað var í 1903. Eg minnist, at tað kom boð til mín, at uppgeva mína biografi. Mær dámti ikki at skriva um meg sjálvan. Og eg bað so A. Evensen at gera tað. Hann hevur altso sett hetta. Hann kundi hava sett »besiddere«, men tað kundi eisini ljóða nakað stórt. Og so kundi hann sett »kongsbonde«. Tað orðið vildu teir ikki verið kunnugir við, og tað hevði tá kannska av teirri grund ljóða av ann meira.

A. Samuelsen: Eg kann ikki hugsa mær, at vit nakrantíð vilja fáa ríksdagsmenn, sum nokta Føroyingum tann studning, teir kunnu fáa. Tað bestemta tilfaldi, sum eg nevndi, vísir, at eg ikki taki persónlig og politisk hensýn. Eg skal leggja aftrat, at hesin maður, sum eg

hevði við at gera, hevði fingið noktilsi frammanundan; men og fekk hann til at sokja aftur. Um nan meinar, at hetta er at skulla ella at hjálpa, tað veit eg ikki. Eg haldi framdeilis fast, at tað ikki er A. Evensen, men Patursson, sum hevur skrivað, at Patursson var eigari av Kirkjubø. Ríksdagurin gongur út frá, at teir sonn menninir, sum eru bidnir um at skriva, eisini luva gjørt tað. Her hjálpir ikki at koma við einom manni, sum er deyður.

Edv. Mortensen: Tað er merkiligt, at A. Samuelsen — tá Patursson sigir, at hann ikki hevur skrivað tað — tó skal standa og siga, at Patursson hevur skrivað tað alíkavæl. Kann ein virkuliga tillata sær slíkt í einum parlamentariskum tingi?

A. Samuelsen: Mortensen hestemmar ikki, hvat sum er parlamentarisk at brúka her. Patursson stendur til ansvar fyri, hvat har er skrivað. Ríksdagsmenn ganga út frá, at tað er Patursson sjálvur, sum hevur givið upplýsingarnar.

J. Patursson: Eg skal ikki træta um deyðar menn, men eg tvist ikki í, at og bað A. Evensen, sum var og altið var mín vinur, at gera hetta fyri meg. Annars er tað merkiligt av A. Samuelsen at leggja so nógva vekt á eitt lítið orð, sum har er komið at standa, ikki minst, tá hann sjálvur hevur uppgivið, at hann hevur verið fúti.

A. Samuelsen: Tað er tann munur, at eg havi verið konstituerður fúti, meðan tingmaðurin í Kirkjubø hevur sagt eigari. Eg segði sannheit, men Patursson ósannheit.

J. Patursson: A. Samuelsen hevur sagt, at hann hevur verið fúti.

A. Samuelsen: Eg havi sagt, at eg havi verið konstituerður fúti.

J. Patursson: Tað stendur, at A. Samuelsen hevur verið fúti, ikki konstituerður fúti. Og so stendur meiri: at hann hevur verið formaður í skúladirektiónini.

A. Samuelsen: Eg biði hann koma við bókini, sum rigsdagsbureauet gav út og vísa, at eg havi sagt, at eg havi verið fúti og formaður í skúladirektiónini. Men eg skal koma við bókini, so Patursson sær, at hann er eigari av Kirkjubogarði. Inntil hann kann vísa mær tað, stempli eg hansara orð sum grov ósannheit.

So varð stemmað um tingtalsuppskotið, sum gekk út uppá, at tingið fastholdur viðtøkuna frá ífjør.

Hetta varð samtykt.

Avtoka av ymsum forbodum.

3. viðgerð.

Edv. Mortensen: Hendan sok er komin til 3. viðgerð, fyri at spurningurin um vøruhandilin kundi koma til umtalu og fyri, at tingmonn kundu hugsa betri um tey ymissu uppskot, sum her eru. Tann eini spurningurin: vøruhandilin, hevir verið til umroðu, tá roknskapurin var til viðgerðar, so hann siggi eg burt frá. Av hinum vil eg bert nerta við eitt broytingaruppskot, ið 4 av nevndarmonnunum hava framsett um gerð- og markfrið (hin fimti var burtur, táið tað var sett fram). Tey seinastu árini hava vit haft reglur um hetta eftir krígslógini, og tær hevði nevndin skotið uppá skuldu falla burtur. Men nú er ikki at vænta, at hann nevnd, ið var sett viðvíkjandi búnaðarlógini, kann koma við nøkrum uppskoti í ár um gerð- og markfrið, og við tað, at hetta eru ógvuliga umráðandi viðurskiftir, hava vit fyrisligið, at tær bráfengis reglurnar, ið vóru gjørdar undir krígnum, skulu upprætthaldast fyri fyrst.

O. Effersøe: Det staar mig ikke fuldstændig klart, hvorledes Fremgangsmaaden er med disse Forbud, der er udstedt under Krigen. Jeg vil sporge Formanden for Udvalget, hvorledes det forholder sig med Udstedelsen og Ophævelsen af disse Forbud. Kan de ophæves ved simpelt Bekendtgørelse, eller skal der gives Approbation af Ministeriet, for det er vel ikke Meningen, at denne Ophævelse skal erstattes med nogen Lov.

A. Samuelsen: Eg havi verið í útvalginum og skal siga nakað um tað uppskot, ið stendur undir punkt 2 og 3, um reglur fyri nýtsluni av jarðalvalinum. Eg vil ráða til, at vit behalda tann núverandi ordning; ein grund til tað er, at táið grindaauktiónir vóru, kom grindin heilt upp í spekulatiónsprísir, so eingin kundi keypa uttan tey allarríkustu. So gjordu vit hesi hostemmilsi í 1917, at eingin auktión mátti haldast. Kriggið er yvirstaðið, men eg

ori bangin fyri, at fáa vit fría auktión, vilja prísirnir óivað enn verða svimlandi høgir, so fólk við smáum inntøkum heldur ikki nú kundu koypt sær nakað tvørt. Eitt uppskot er framsett um heilt at uppheva hetta forboð, tað dámar mær best, men eg haldi ikki, at tíðin til tað er inni enn. Eitt annað forslag var um at upphova hatta forboð norðanfyri men ikki sunnanfyri, og tað er motiverað við, at tað skal hava virkað gott sunnanfyri, men ikki norðanfyri. Hetta dámar mær ikki, at fáa forskelligar reglur fyri ymsar partar av Føroyum. Eg má halda uppá, antin skulu vit behalda hesar reglur ella uppheva tær, og seta nakrar betri í staðin, men tað verður ikki gjørt í ár, tí vit vita, hvussu tað verður, táið tað kemur til tos um grind her á tingi. Tað er jú møguligt, at vit til næsta ár kunnu einast um eina rættferdiga avloysing av jarðahvalinum, so hesin spurningur tá kann ordnast. So leingi tað ikki kann gerast, vil eg anbefalla at hava tann ordning, ið nú er.

Edw. Mortensen: Tann seinasti talari helt, at tað uppskot, ið tvoir nevndarlimir hava framsett um at hava serligar reglur fyri Suðuroynna, er tað ringasta, og gevur hann til grund, at hann ikki ynskir ymiskar reglur fyri ymsar partar av landinum. Men tað er tað jú netupp, sum nú er. Í Suðuroy verður jarðahvalurin lagdur beinleiðis til partahvalin, norðanfyri fáa kommunurnar hann at ráða yvir; men táið tað frammanundan oru ymiskar reglur, og tær í Suðuroy hava virkað gott, men ikki tær norðanfyri, so haldi eg tað vera skeivt at fara at avtaka tær reglur, ið hava virkað gott, og sum øll fólk har eru tilfrids við.

Formaðurin: Til Hr. Effersøes Forespørgsel om, hvorledes den fremtidige Fremgangsmaade vil være med Hensyn til Iværksættelse og Ophævelse af visse Forbud, grundet paa Krigssituationen, skal jeg svare, at Forholdet er i Øjeblikket det, at Amtet af Regeringen er forsynet med Bemyndigelse til at udstede Forbud og midlertidige Lovbestemmelser af denne Art. Denne Bemyndigelse er ikke taget tilbage. Saafremt der nu bliver vedtaget en ny Lov om Muligheden for at udstede saadanne Forskrifter, vil det selvfølgelig ogsaa paavirke den Myndighed, Amtet her har faaet overdraget. For Øjeblikket er Forholdet det, at Amtet kan direkte ophæve disse Forbud, og at de, der ikke bliver ophævet, bliver bestaaende. Hvorledes Forholdet bliver Fremtiden, afhænger som sagt af den Lov, som i Øjeblikket er under Behandling i Rigsdagen. Det vilde muligvis være praktisk, om Tinget foreslog en Lov, der gjaldt i et begrænset Tidsrum, til den virkelige Lov kan blive gennemført, et Forslag, der muligt kunde udgaa fra Udvalget angaaende Landbrugsloven.

O. Effersøe: Jeg skal først gøre en Bemærkning til det, Amtmanden fremførte. Det var nødvendigt, at vi fik Bestemmelser om Hegn og Markfred. Nu under Krigen, da det knab med alle Tilførsler, var det nødvendigt at benytte vor egen Jord, saa meget som muligt, og det første, der var at gøre i den Retning, var at sikre Jordbrugerne den fulde Benyttelse af deres Marker ved disse foreløbige Bestemmelser. Jeg har tænkt mig Muligheden af en Lov herom af en midlertidig Karakter og har ogsaa udarbejdet et Forslag til en saadan Lov, som jeg vil fremlægge for Landboudvalget. Sagen er den, at det Forslag om Hegn- og Markfred, som er udarbejdet af Landbokommissionen, er saa omfattende, at det i hvert Fald ikke afgøres i denne Tingsamling. I det Udkast, jeg har affattet indenfor Udvalget, er der taget saa meget med, som er praktisk gennemførligt, og som er tilstrækkeligt til at betryggе Brugsretten til Markerne. Nu er det Spørgsmaalet, om vi skal nøjes med at ophæve de nugældende Bestemmelser, eller vi skal gaa et Skridt videre og søge Lovhjemmel for nogle mere omfattende foreløbige Bestemmelser.

A. Samuelsen: Tað nú gerast munur á extraordinerum og ikki extraordinerum forholdum, og tí, sum verður gjørt undir sovorðnum forholdum. Tað vóru extraordiner forhold, sum bovirkaði tær reglur, vit viðtóku viðvíkjandi grindareglementinum. Nú vil mann uppheva tær í orkuleysi av, at tey extraordinera forholdini eru uppatbildin. Tað meini eg ikki. Eg meini tvørtímóti, at tey sonn ónormalu forhold gera seg galdandi í Suðroy sum norðanfjørðs. Tá vit aftur koma inn í normal forhold, mugu hesar reglur kunna upphevast, líka so væl fyri Suðroynna sum fyri norðanfjørðs landspartarnar.

J. H. Poulsen: Eg vil bara siga nokur fá orð angangandi bekentgerilsi um frið í bonum. Tað er óivað noyðvendugt at behalda tey bestommilsini. Vit í útvalgimum angandi landbólógirnar hava tosað nógv um tað spursmálið, og Effersøe bleiv

í útvalginum uppfordraður til at avfatta nøkur bestommilsir í so máta; hansara skrivilsi gongur nærmast útuppá eitt forsok til at gera eina blívandi lóg, sum vit kunnu verða fornøyaðir við í nøkur ár. Mær dámar ikki at fara undir at arbeiða eina lóg um hogn- og markfrið aleina, tí harvið koma vit ínn uppá annað, sum hongur saman við hesum. Tað arboiðið eigur at gerast til fullnar. Eg eri mest stemtur fyri, at vit behalda tey bekomtgerilsi, vit hava haft undir krígnum viðvíkjandi friði í bønum enn eitt ár.

Formaðurin: Jeg tror, det vil være den mest praktiske Fremgangsmaade, at vi i nærværende Sag afstemmer om, at den foreløbige Bekendtgørelse skal opretholdes; jeg tænker mig dette vedtaget under den Forudsætning, at Landboudvalget optager den Side af Sagen til Behandling: om Udfærdigelse af en saadan Lov. Hvis det ikke kommer til noget Resultat bliver den foreløbige Bekendtgørelse staaende, i modsat Tilfælde falder den bort af sig selv. Her vil der altsaa blive at stemme, om disse foreløbige Bestemmelser skal blive staaende eller ikke.

Edv. Mortensen: Til hr. Andrass Sámalsson bert tvey orð. Eingin hevur noktað fyri, at tey sonn extraordinera, ónormalu viðurskiftir fyriliggja enn, men táið vit fyrisláa at uppheva tær extraordinera grindareglurnar norðanfjørðs, so er tað tí tær eru ikki góðar og hava virkað óholdiga. Harímóti hava tær virka gott í Suðroy.

O. Effersøe: Med Hensyn til Grindereglementet mener jeg absolut, at der er Grund til at have forskellige Regler for Suderøen og de nordligere Dele af Øerne. Samtidig vil jeg dog fremhæve, at der bør være Regler baade for Suderøen og nordenfjords. De bestaaende Regler har for Suderøens Vedkommende virket tilfredsstillende, mens der synes at være delte Meninger om deres Gavnlighed for de nordlige Øers Vedkommende. Det forekommer mig dog nærmest, at det hovedsagelig er en Del Personer, paa den østlige Del af Vaagøen, der synes, at disse Regler ikke duer, mens den øvrige Del af Færinger maaske nok mener, at Reglerne ikke er saa gode som ønskeligt, men dog langt bedre end ingen Ting. Derfor synes jeg, at det af flere Grunde er betænkeligt at ophæve dem. Jeg kan ikke godt tænke mig, at Lagtingot vil gaa med til helt at ophæve disse Regler, saa længe Forholdene er saa unormale, og jeg kan navnlig ikke forstaa, hvorfor Repræsentanter for Suderøen ikke kan indse, at de er brugelige, selv om de ikke er saa gode, som de burde være. Særlig uheldigt vilde det være, hvis Resultatet blev at Bestemmelserne for Suderøen ikke opnaaede formoden Tilslutning, fordi man ikke vil stemme for at opretholde de nordenfjords Regler. Jeg vil derfor foreslaa, at vi først stemmer om Hr. Samuelsens Forslag: at bibeholde alle Reglerne, og hvis det falder, saa at stemme om Suderøerepræsentanternes Forslag. Derimod vil det falde vanskeligt at stemme for Suderø-Forslaget, hvis det kommer først, thi bliver det vedtaget, saa bortfalder jo Samuelsens Forslag.

Formaðurin: I Anledning af de Bemærkninger, der er fremsatte af Tingmanden fra Sudero, skal jeg meddele, at de vil blive taget til Følge, saaledes at der først stemmes om Andreas Samuelsens Forslag og siden om Suderøforslaget.

A. Samuelsen: Eg trúgvi aldeilis ikki, at allir Føroyingar eru samsintir um, at reglurnar her norðanfjørds eru óheldigar. Eg havi einki ímóti, at Suðringar behalda sín ordning, tá teir halda hann vera so góðan; mitt uppskot gevur teimum jú nettupp tann fordeil. Annars hevði eg tonkt mær, at hini uppskotini, sum ganga útuppá at forandra tað bestandandi, komu fyrst, og mitt, sum vil bevara tað bestandandi, kom aftanú, men eg skal einki siga ímóti hesum ordningi, hlant annað tí eg havi hoyrt sagt frá formannsstólinum, at formannsins avgerðir kunnu ikki diskuterast.

R. Nielsen: Eg vil so taka mítt endringsforslag tilbaka til fordeil fyri Suðroyaforslagnum.

A. Samuelsen: Eg trúi, Rasmus Nielsen hevði stillað sítt forslag saman við Jógvan Rasmussen, so hann kann val ikki taka tað aftur uttan at hava tosað saman við Jógvan Rasmussen um tað. Men eg forstandi val hansara tankagongd. Tað er bara kediligt, at Jógvan Rasmussen ikki er heima. Um tað var magutligt, vildi eg yvirlagt, at avstemningurin var útsettur til hann kom aftur.

R. Nielsen: Eg havi ikki konfererað við hann, tí hann hevur ikki víst seg at hava stórt interessu fyri tí, eftirsom hann er heimfarin. Um hann meinar tað, so

kann tað væl standa, men eg veit, at A. Samuelsen ikki stemmar fyri tí.

A. Samuelsen: Nú erklerar R. Nielsson, at hann ikki hevur loyvi at taka forslagið aftur. Annars haldi eg, at hann ikki hevur loyvi at siga, at Joen Rasmussen ikki interesserar seg fyri hesum av tí, at hann er burtur nú. Hann er interesseraður í hesi sak. R. Nielssen hevur eisini verið burtur í hesi tingsamkomuni.

R. Nielsen. Eg vóni so, at A. Samuelsen fer sínar felagar at stemma fyri tí. Eg taki ikki hetta tilbakar.

A. Samuelsen: Eg ynski, at mítt uppskot verður samtykt, men ikki við, at hini uppskotini ikki vera tilstrekkiliga forsvaraði.

Um avstemningina sí: sakuppritið.

Sakin um búnaðarskúlan verð útsett til næsta fund.

Fundur fríggjadag 5. september.

Landbúnaðarskúli.

3. viðgerð.

J. H. Poulsen: Tað varð tosað nógv um hesa sak við 1. og 2. viðgerð, og við 3. viðgerð plagar ikki at vera stórt sagt, men næstan bert stemmað, so eg skal ikki siga nógv hesi ferð. Vit eru ivaleyst allir samsintir í, at royna at gera so nógv burtur úr okkara landi, sum gjorligt, og hjálpa vinnuvegunum fram; tað er jú samfundsins plikt at skapa betingilsi fyri, at vinnuvegirnir kunnu hava góð kor, og landbúnaðin má væl hetta roknast, at skaffa ungfólki kunnleika í at dyrka jørðina. Eg fram holt við seinastu viðgerð, at tað var komið ynist hindrandi uppí, ið fordaði sakini, samt av óforstáilsi fyri okkara viðurskiftum, samt av øðrum orsøkum, nt. a. varð tað hildið fram í landstinginum, at tað var væl yvirhøvur eingin trongd til ein slíkan skúla í Føroyum. Men nú eru vit kortini kommin so langt fram, at vit kunnu síggja út fyri endan, og hetta skyldast ikki minst tí, at góðir menn uiðri í kongaríkinum hava lagt sær eina við at hjálpa okkum at fáa hetta í lag. Har er nú givin ein bevilling til bráfengis arbeiði, og tað vil verða hildið fram við tí og sokt um tað, um vit taka væl undir hetta í dag. Nevndin meinti, at tað vóru nokur punktir, ið tingið kemur at taka stoðu til, og vit hava tí skrivað eitt lítið yvirlit yvir okkara sjón uppá eini tvey punktir í skrivilsinum frá ministerimum. Vit meina serliga, at tað nóður um at gova studning til ungar Føroyingar, ið vilja burtur at lura búnaðarbrúk, hetta er einki innstillingspunkt, men verður lagt við betonkningina. So er tað tey punkt, vit skulu stemma um, og sum vit ikki eru heilt einigir um; eg skal ikki tala nógv um hetta, men vil bert ynskja, at so mangir tingmenn sum møguligt stemma fyri tí uppskoti, ið er framsett av 3 nevndarmonnum, at skúlin skal koma at liggja í Hoyvík. Plássið liggur so væl fyri, at tað fult út uppvigar tað, at tað kundi ynskt betri í aðrar mátar, og eg vil tí biðja tingmenn stemma fyri Hoyvík. So er tað, hvussu bestýrilsið skal verða valt; har hevir fleirtalið fyrisligið ø nevnd valdar, ein formann búgvandi í Føroyum, valdur av justitsministerinum, búnaðarráðgevaran sum sekretær og ein mann, búgvandi í Føroyum, valdur av løgtingi; um fram ein valdur av himum danska búnaðarskúlalærara felagi, og ein valdur av »Statens Planteavlsudvalg«. Eg meini, at tað er beint at ganga inn uppá hetta og skal eg mæla til at stemma fyri tí. So er eitt annað uppskot um, hvur ið skal ansøta fyristoðumannin og royndarbrúksleiðararnar. Har er skotið uppá av 5 nevndarmonnum, at fyristoðumaðurin skal antakast av administratiónsnevndini og royndarbrúksleiðararnir av búnaðarministeriinum. Patursson og R. Nielsen fyrisláa, at allir skulu ansetast av administratiónsnevndini, hetta fer at koma út uppá eitt, men tað seinna uppskot hevir tað fram um hitt, at tað samlar meira í administratiónsnevndini, og eg vil tí frávíkja mínum uppskoti og stemma fyri hesum seinna frá Patursson og R. Nielsen.

J. Patursson: Eg talaði nakað nógv við 2. viðgerð, og tað mesta var út frá tí áliti, ið er givið í hesum máli av Jtini donsku nevndini og útgivið av ministeriinum. Eg talaði, tí sum fornyskur jørðabrúkari og sum ein, ið hevir lært búnað aðra staðni, kendi eg meg illa við at síggja, at teir framhalda standin her á landi verri enn hann er, og framhaldu jørðabrúkararnar í Føroyum sum nitti dugandi. Teir hava rokuað út, at ein meðal føroysk kúgv

mjólkar ikki meira enn 600 pottar um árið: hetta verður jú almannakunngjort niðri í Danmork, og hetta má geva Danskarum eitt ógvuliga ringt bíleti av standinum í Føroyum, táið teir lesa, at ein meðal føroysk kúgv ikki skal mjólka minira enn ein almindilig dansk geit. Men eingin Føroyingur vildi verið so býttur at hava eina slíka kúgv, ið altso skuldi mjólka hálvanannan pott um dagin gott og vel. Um fanni búnaðarráðgevarin roknaði við 900 pottum pr. kúgv um árið, men tað er nú langt síðani, og tað er tvaleyst yvirhovur langt meira nú. Tá tíð eg havi verið bóndi havi eg fort mjólkaroknskap, og tað verður vel eini 20 ár, og tað er so vorðið, at hjá mær hevir hvor kúgv yvirhovur givið 1800 pottar, 2000 pottar, í ringum árum eitt sindur minni, og hetta eru kýr, sum allar hava verið hagakýr. Tað kann vel vera, at hetta er yvirhovur meira enn tað annars hevir verið uppá neyt í Føroyum, men eg kann ikki ganga við til hatta talið 600 pottar um árið sum á nakran hátt beint. Roknað eftir hvat kýrnar viga í Føroyum hava mínar kýr givið líka nógv pr. vekteinheit sum kýrnar í Danmark, og fituinnihaldið hevir verið stórri. Hetta eigir tí at páfalast. Um hesir menn koma her ein stuttan mánað, koma teir ikki at koma viðurskifti okkara so væl, at teir verða alkonir. Eitt annað, ið eg má finnast at, er hetta: Tað verður hildið fram, at eftir frágreining búnaðarráðgevarans hevir avfallið av seyði verið so nógv, at tað hevir minkað um skurðin við 75 pct. Hetta vil av donskum lesarum skiljast so, at Føroyar av óhappi missa um árið 75 pct. av seyðinum; men um so var, mátti seyðabrúkið so ógvuliga skjótt komið í oyðu. Tað er gamul rokning norðanfjarðs at seta 20 framyvir av 100 lombum, — 80 at skera. Í tav tí roknaðu teir tíggjundutakið. Tá vit lesa tær frágreiðingar, teir gomlu hildu fram, tá teir samroddu um hagalógina, finna vit góða grund fyri hesum, men tá teir ikki settu meir enn 20 framyvir av 100 unnndu teir halda seg vera ivaleysar. Eg havi sett fram fyrr at tapið má roknast til 15 pct., í vanligum árum, tá roktin er sum hon eigur at vera. Men so koma fellisár uppímillom. Bóndafelagið vendi sær fyri 2 ella 3 árum síðani til løgtingið við umsókn um at tað vildi gera nakað fyri fellisár og lambadeyða. Vit eru ikki farin fyri at taka tey ringu árini, vit kunnu ikki verja okkum til onnur móti lambadeyða av skalvi og stórkava. Tá føroyskt seyðabrúk verður drivið undir vanligum viðurskiftum soleiðis sum Føroyingar duga at driva tað, verður ikki meira avfall her enn í Skotlandi og Noregi. Í Skotlandi rokna teir við 15 pct., í Noregi er val nakað meir — har leggst jú ofta úlvur og vargur í seyðin —, í Islandi er tað minni, men sjálvtum teir har eru so langt fram eru okkum í seyðabrúki, kann tað tó honda seg, at har eisini verður, um ikki fellí, so nærum fellí. Val hava teir lóg, ið sigur, at teir ikki mugu seta meir á enn teir hava hoyggj til, men tað kann honda, at hoyggið er so ringt, at tað faðir ikki, og at teir tí taka til at foða við tara, so arnar verðu sjúkar og lombini doyggja. Sjálvt við besta rokt kann tað honda í árum við sardeilis stórum avfalli, at seyður duyr undir skalvi og at tað er ómuguligt at reelda hann. Ja, tað er hent at menn hava lagt sær so nær við at bjargu seyðinum, at teir sjálvir eru farnir sama veg — til havs. At avgirða sovorðin pláss, sum júst eru beroknaði til vetrarhaga fyri seyðin, vil siga, at so má ein hava nimmi seyð. Hvussu vit bera okkum at, mugu vit í verstu árum altið rokna við at missa hundrað av seyðnum av skalvi. Nú er tað jú so, at hesi stoggu tal eru logd fram fyri donsk eygu uttan nakra frágreiðing um, hví tað er so, og hesir danskir menn mugu tí halda, at hetta er eitt syndarligt skil. Hetta er ikki beint. Tað er bert á í hesum betonkningi, at tað má ganga ár, áðrenn vit byggja landbrúksskúlan, og í hesum árum skulu royndir gerast her, hvar á undirvísningurin við skúlan skal byggjast. Men tað, sum so knappliga kann verða gjort av royndum her, skapar ikki nakað grundarlag fyri undirvísninginum; tað er alt ovstutt tíð. Harímóti átti vit at fingið samlað saman alt, sum fyriliggur av føroyskum jarðabrúks royndum onnur annan manni, serliga viðvíkjandi seyðabrúki, og av nýggjari royndum. Var hetta samlað, tilrættislagt og útgivið, kundi tað verið eitt dyggt grundarlag. Tað sær út, sum hesir kundu halt yvirsæð, at har er nakað av jarðabrúksroyndum, ið vardar kunnu vera at byggja á og tað má hartuna meg sum føroyskur bóndi, at selitið verður virt um tað, har er gjort, av maur við mangom øðrum. Men eg skal siga tað altfyri eitt: Tað hevur ikki verið atgangd til at fosa um hetta, og tá vil eg ikki finnast at nevndini, tí hon einki uppskot hevur sett fram um hetta. Men vit eiga at gera ítvegir fyri at kosta útgivið tær royndir, sum gjørdar eru; løgtingið nigur at veita eitt sindur av pening til menn, ið vilja páteka sær at samla hetta tilfarið saman, og síðani til at fáa tað prentað. Hetta hevði verið

hentir pengar og eg ivist ikki í at løgtingið vil gera, hvat tað kann í so máta. Eg havi viljað borið hetta framá ting, tí um eingin mótmæli tí, so kann ein rokna við, at tað hevur tilslutning hjá tingmonnum og tað vil vera ein stuðul hjá teim monnum úti um landið, sum kundu haft hug at farið undir hetta starv, at vita sær, at teir kunnu vænta eitt viðurlag fyri arbeiðið. — Eg vil ikki á nakran hátt siga, at hesir donsku menn ikki vilja úttala seg væl um føroyskar traðarmenn, bøndur, agronomar og landbrúkskandidatar, men her er ein feilur í hesi frágreiðing. At tað er ringt at eiggja gløgt við donskum eygum á føroyskt jarðabrúk vita vit; danskir menn, prestar t. d., hava gjørt so nógvar roynd'r her við donskum jarðabrúki, men ikki hevur sýnst nakar eftirgróður. Tá landhúsholdningsselskapið vístu Føroyingum at fara til Noregs at heinta sær kunnleika har, vísti tað seg brátt at vera tann beini vegurin; tí hevur spurst væl burtúr. Men seyðabrúk hava vit ikki kunna lært í Noregi. Um tað tí kundi blivið so, at vit umframt at læra vanligt jarðabrúk í Noregi, kundu farið til Skotland og Ísland at læra seyðabrúk, so høvdu vit skjótt komið longur enn vit nú eru.

Eg skal ikki nerta við tað, sum sagt er um royndarbrúkið heima í Kirkjubø, og hvat dugur ið var í tí, men bert siga, at her eigur ikki bara at roknast við teim 6 árunum, tá studningurin var givin; tað var roynt at halda tí uppi longur enn tey árini og haðani eru útgingnir o. u. 50 næmingar, bæði menn og kvinnur; tað kann tó kannska hava haft eitt sindur av týdningi fyri landbrúk í Føroyum.

I nevndaruppskotinum er holst eitt punkt, sum hin stóra parturin av nevndini og og ikki hava kunnað sameinst um: hvussu skipanin fyri skúlan skal vera samansett. Her havi eg og Rasmus Nielsen eitt serligt uppskott. Vit, og helst eg, hava hildið okkum til tað, at Føroyingar kunnu standa fyri einum sovorðnum skúla sjálvir, tí vit hava so mætar menn úti um landið, og eg havi altið hildið fram, at vit mugu hava atgongd til at venda okkum til donsk feløg og biðja tey hjálpa okkum við ráð og dáð. Eg kann í hesum viðfangi ikki lata vera at peika á munin ímillum, hvat hin fyrsta nevndin, ið niðursatt var av danska landhúsholdningsselskapinum og norskir autoritetar siga um, hvat vit kunnu gera. Táið uppskotið var sent niður frá tí føroysku búnaðarnevndini um at stovna landbrúksskúla í Føroyum fingu vit frá landhúsholdningsselskapinum eitt svar, hvar teir m. a. siga: »Udvalget formener, at der til Sagens Gennemførelse kræves en dygtig Ledelse og i alt Fald til at begynde med nogen Støtte, da Sagen formentlig ellers staar Fare for at forsumpe og glide ud til intet....«. Hetta er eitt undarligt úttalilsi frá eini nevnd, sum landhúsholdningsselskapið hevði niðursett til at fyrireika hesa sak. Vit hildu hetta vera undarligt úttalilsi at fáa frá nevndini, sum landhúsholdningsselskapið hevur útnevnt. Hetta stendur móti tí, sum vit hava fingið frá norskum avtoritetum. Vit bóðu kgl. norska selskapið um ráð og teir hava vent sær til teir ypparstu menn í jarðbrúksviðurskiftum í Noreg. Og teir siga, at teir einki hava at finnast at princippinum í tí uppskoti, sum vit í bóndafelagnum saman við monnum utanfyri hetta felag hava sett framm. Teir siga enntá, at tað er aldeilis gott skil á teimum princippum, vit hava sett framm, og so loggja teir til, at tá vit Føroyingar hava so gott skil á princippinum, so eru Føroyingar teir bestu til at føra hesa sak út í lívið. Eg má siga, at tá tað er tað norska jarðabrúkið, sum kann geva tað besta grundarlag fyri jarðabrúkinum í Føroyum, so má eg halda, at hetta úttalilsi frá teim norsku avtoritetunum er betri enn frá teim donsku, sum siga, at »Sagen vil forsumpes, um ikki danskir menn koma at standa fyri. Teir donsku menninir gera ikki hetta fyri at siga okkum nakað ringt, men tí teir halda so vera. Eg vil væl respektera teir. Men vit hava hildið, at Føroyingar sjálvir kundu gera tað. Formaður nevndarinnar segði, at okkara ungu menn og kvinnur skuldu fás studna til at fara út og læra. Ja, hetta eigir eisini at galda fyri føroysk komufólk. Teimum torvar ikki minst at læra lundligt húshald fyri at byggja heim, sum hava góðraplúss í okkara egna landi og ikki bert verða eitt tilfeldugt páhong. Føroysk komufólk eiga at fara á húshalds- og húsflidsskúlar til at læra, men tað má vera komufólk, sum framman undan eiga rót í góðum føroyskum húshaldi og føroyskum heimavirki og sum hava skil á at leggja tað sum okkara ommur og mødrar hava varðveitt saman við tað, tær læra aftrat úti. Tað gamla føroyska innanhýsis lagið er nú nógv dottið burtur, men um kann fáast fatur í tað. So er tað spurningurin um, hvar búnaðarskúlin skal vera. Mær dámar ikki væl at hann verður í Hoyvík, tí garðurin har líkist ikki gerðum í Føroyum yvirhovur, og hann hevur hvørki bjarglendi ella líðir ella fjallahaga. Mær dámdi tí betur um skúlin kom at vera longri úti á landsbygd. Tað kann tó vera

at garðurin í Hoyvík kundi egna seg fyri teir, sum vilja læra hósmansbrúk. Ég eri ikki so fogin uppi yvir Kjalnesi heldur. Mær hevði dámt betri at bíða við spurninginum, hvar skúlin skal vera. Men tó skal eg ikki ráða tinginum til at gera tað, og heldur tingið Hoyvík vera tað betra plássið, so skal og ikki finnast at tí.

Poul Niclasen: Allir Føroyingar vilja viðganga, at ein búnaðarskúli vil hava stóran týdning fyri okkara jarðabrúk. Tað er so ofta hildið framm, at okkara jarðabrúk mett við jarðabrúk aðrastaðni letur nógv eftir at yniskja. Ein tílíkur skúli vil hjálpa Føroyingum at útvinna mest møguligt av jørðini og at gera sum mest arbeiði í stuttari tíð. Tann hugsháttur ger seg geldandi um allan heimin at fáa sum mest arbeiði gjørt í stytst møguligari tíð. Ífjør lá sakin soleiðis fyri, at menn vóru á einum máli um at slíkur skúli egnaði seg best at vera á Kjalnesi. Men síðani er hent, at millumtinganevndin, sum tá var sett, hevur verið í Køypmannahavn og umráðst um hetta mál. Og nevndin er so komin ásamt um við teir har niðri, at Hovvíks garður er fult so væl skikkaður til at brúkast til búnaðarskúla sum Kjalnes er. Viðvíkjandi jarðaviðmiðskiftum, um hvussu góð jørðin er og hvussu lun eguar seg, so má og siga, at har kenni eg meg ikki nóg sakkunan til at úttala nakran dóm. Men eg haldi, at ein tílíkur skúli hevur vinning av at liggja nær við Havnina. Hetta argumentið er fyri meg ógviliga vektigt. Ein skúli, sum liggur nær við Havnina, hevur betri líkindi til at gera gagn fyri fólk enn ein skúli norður á Kjalnesi, tí hann er løggligari fyri fólk yvirhovur at koma til. Eitt annað er eisini, at tá skúlin liggur nær við Havnina, verður tað lættari at fáa tímalønarar til hann. Tað vil av hesum týðiliga framganga, at eg vil stemma fyri uppskotinum hjá J. Poulsen, R. Rasmussen og J. H. Poulsen um, at skúlin verður í Hoyvík. Hettar eru teir tríggir menninir, sum hava verið í Køypmannahavn og samráðst um hetta málið. Og eg haldi hesar menn vera so sakkunar sum landbrúksmenn, at eg ivist ikki í, at tað er gott, sum teir halda. — Hoyvíksgarður er nú burtforpaktaður. Ég veit ikki, hvussu mann hevur stillað seg yvir fyri hesum manni, um tingið nú samtykkir at lata búnaðarskúlan vera í Hoyvík. Ég kenni handa mannin væl, og tað verður hildið av øllum, at hann er ógviliga dugiligur jarðabrúkari. Ég havi eisini talað við fútan viðvíkjandi hesum, og fútin sigir, at hann er væl tilfriðs við hendu mannin og heldur tað vera torført at finna mann, sum betri enn hesin er skikkaður at driva garðin. Ég vil studla til, at nevndin, sum fær við hetta mál at gera, tekur hensyn til teir menn, sum hava verið á fútagarðinum higartil.

A. Samuelsen: Ég skal fyrst siga, at tann argumentatión av teim, sum ikki eru samsintir við meg, hevur ikki broytt mína sjón á sakina. Ég haldi, at tað kann vera, at Hoyvík egnar seg til at vera pláss fyri skúlan, men tað fyrikemur mær, at løgtingið má halda nakað uppá, hvat tað einaferð hevir viðtikið; tí um løgtingið fer eitt ár at taka eina stoðu, næsta ár eina aðra til somu sak, so vil tingið ikki verða mett høgt. Man má sjálvandi lata seg yvirbevísa av argumentonu, men man eigir ikki at fara frá sínari stoðu so lætt sum her. Teir ið hava verið í Køypmannahavn, vita væl, at tá man helt fast uppá at hava Hoyvík, var tað tí, at man trúði, mann kundi fáa báðar garðarnar, tó tað var framhildið, at man kundi hjálpast við øðrum; á fyrstan tíð var tað ódámin at fáa báðar. Eg kann ikki teinkja mær at kunna fáa báðar garðar; skulu vit royna at fáa teir, má eg rokna við, at tað verður ikki lættført, og spursmálið má so skjótast langt út, so tað fovnlotiga arbeiði fer at vara mest alla okkara tíð, og tað skuldi ikki verið, skúlin skuldi væl verið høvnð sakin. Vit komu seinast inn uppá tað historiska í hesari sak, og tað vísti seg, at bæði Effersøe og eg sóu heilt øðrvísi enn ørðforarin uppá tann historiska útvikling av okkara landbrúki. Effersøe sá kanniska uppá hetta ikki heilt so tvørtur ímóti ørðforanunum sum eg. Tað er ikki so gott í einari talu her at framføra fult út bevísir fyri hví man hevir einn bestemta stoðu í einari so umfatandi sak, ið gongur so langt aftur í tíðina sum henda, serliga tá tað royndarbrúk vit hava hafi fyrr. Eg skal, um tað krevst, ikki halda meg nógdan at klára fyri hesum, men annars skal eg royna at lotta tað fyri tingið og ikki ganga nærri inn á hetta nú enn nevðugt er. Tað er sagt, at Schrøter við sínum vanliga ídni var fyrsti maður til at fáa hetta royndarbrúk í lag. Men tá tað fyrst var komið í lag, vita vit allir, í hvussu er teir, ið minnast eitt sindur aftur í tíðina, at Schrøter føldi seg ógviliga skuldugan. Undirvent, at hann hevir úttalað seg, vita vit, at ein viðgitin bóndi, ið var í tilsýninum fyri skúlan, Berent Wang í Kalbak, hann hevir eisini úttalað seg, og hann let ikki væl at. Eg

skal ikki lesa upp, hvat teir hava skrivað herum, men fyri teir, ið hava hug til at seta seg inn í hesa sak, skal eg vísa á, at Schrøter hevir úttalað seg í 1900 í Dimmalætting nr. 34, hann hevir eisini úttalað seg í nr. 36 og 37 og í nr. 43. Teir, ið vilja lesa hesar artiklar, vilja síggja, hvat Schrøter, ið var upphavsmaður til skúlan, mointi um hann, og skal ikki fyrigrípa stuttleikan hjá teimum ið vilja lesa hetta, tí Schrøter skrivaði hetta uppá sín vanliga stuttliga máta; eg skal bert siga, at Schrøter heldur fram, at maðurin, ið stóð fyri skúlanum, hevir misfatað ella latið sum hann hevir misfatað sína uppgávu. Sakin var eisini fyri á løgtingi í 1912; har kom fram eitt úttaliki frá sjálvum royndarbrúksleiðaranum, hvar hann undskyldar seg, men tann undskyldning kann ikki hava verið serliga góð, tí í nr. 37 skrivar ein innsendari úr Kirkjubø, at tað var ikki sannheit, hvat Jóannes Patursson hevði givið til undskyldning, at hann hevði yvirtikið garðin í ringum standi, garðurin var aldeilis ikki vanrøktaður táið Jóannes Patursson fekk hann. Eg kann eisini nevna artiklar av Berent Wang, og kann, um eg fái loyvi til tað, lesa nakað upp. Berent Wangs artiklar eru ein bestyrkilsi av Schroters meining. Tingmaðurin úr Kirkjubø kritiseraði aftur í dag nøya, hvat ið er framført í betonkningini; hann meinti, at danskt landbrúk ikki dugir her hjá okkum, men at norskt er betri; eg hugsi, at føroyskt landbrúk man hava royust best, bæði í seyðabrúki og øðrum. Eg trúgvi ikki, at norskt landbrúk hevir sett serlig spor í Føroyum; teir menn, ið hava verið í Noregi og lært, hava einki dugað fram um teir, ið bert hava lært føroyskt jarðarbrúk, táið skal síggjast uppá praktisk resultatir; eg tosi ikki um brúk av vognum, tair vildu komið til Føroya, sjálvt um eingin Føroyingur fór burtur at læra. Eg skal ikko koma inn uppá ta procentrokning, ið tingmaðurin úr Kirkjubø hevði frammanundan um seyð; aldri tingmenn vilja minnast, at eina ferð var hor procentrokning í tinginum um seyð, og tað var tingmaðurin úr Kirkjubø, ið setti ta rokningina fram, og hon varð kritiserað av Jógvan Poulsen, og tað var ein stuttligur dagur fyri tingið. Tað var nakað um, at so og so mong pct. doyði av lombum og so og so mong pct. av gombum seyði, og so smekkaði mann tey bæði procentini saman og tað var so pct. av øllum seyði, ið doyði í Føroyum. Set nú fyri, at tann maður, ið hevir givið kommissiónini hetta procentið, ikki hevir roknað beint, men so er í hvussu er ikki Jóannes Paturssan tann rætti maður til at kritisera hetta, hansara procentrokning kenna vit frá fyrr.

J. Patursson: Eg hopi ikki, at nakar hevir misskilt meg, táið eg áðani talaði um pct. fyri seyða avfall. Eldri menn hava roknað við 20 pct., eg havi hildið tað verið nakað stórt pct., men at vit í fellisárum koma upp á eitt størri procenttal; meðal vil eg sola til at vera eini 15 pct. Annars vil eg biðja tingmenn um, fyri tað at sýslumaðurin úr Eysturoy vil koma nakað nær inn uppá tað royndarbrúk, ið var í Kirkjubø, so ikki at fara og tosa ov nógv um tað her, tí so vita vit frá fyrr, at soint verður liðugt, og líkið nýtt man vera at siga. Tey álop, tingmaðurin í Fuglafirði hevur so góðan hug at gera á royndarbrúkið í Kirkjubø, leggi eg ikki í at svara uppá, og eg vil siga tað við hinar tingmenninar, at eingin annar gor tað heldur. Tað máttu blivið ein endaleysur orðadráttur, ein ónyttiga burturspilt táð, og vit vita, at tað ikki bleiv saldigt tos. Eg vil tí ráráða, at vit norta við tann spurningin.

A. Samuelsen: Tað var aldeilis ikki fyri stuttloika skyld, at eg kom inn uppá sakina forhistóriu. Grundin var tann, at eg lovaði Strøm, tingmanninum í Suðroy, at dokumentera nakað, tað meska, ja í grundini alt tað, eg hevði sagt um royndarbrúkið í Kirkjubø. Eg eri altíð klárur at dokumentera tað úr hesum aktstykkjum, eg havi skaffað mær.

Th. M. Strøm: Eg vil bara svara Andrass Símalsson aftur sum maðurin segði á sinni: alt vor der bruges mange Ord, der høres Daarens Røste.

A. Samuelsen: Hatta var illavorðið sagt av Strøm, at kalla meg ein dúra. Eg vil spyrja próstin, hvat tann maður er skyldugur at líða, sum kallar boiggja sín ódára — tí vit eru jú allir boiggjar, tað hugsi eg próstin vil geva mer rætt í, í hvussu er. Eg ynski ikki, at Strøm skal táa so harðan straff fyri síni ringu orð, men próstin kann siga honum, hvat hann er skyldugur til.

Th. M. Strøm: Eg hugsi ikki, og fái harðari dóm enn tann maður, sum fyrst kom fram við hesum ordatakinum í tinginum.

Nevndaruppskotið (greinirnar I, IIa, III, IVa, V, VIb) varð samtykt.

Prestahald.

2. viðgerð.

–

Prósturin (orðforari) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá, at prosthaldið setist til 2 kr. um dagin í øllum teimum bygdunum í prestagjaldinum, sum presturin á embætis vegna gistir. Meðan presthaldið fyrr árliga kom til 400 kr., verður tað eftir hesi skipan at koma upp í o. u. 1100 kr. um árið. — Orðforarin úttalaði, at hetta vel varð ein byrða fyri kirkjukassan, men hann helt ikki, at tað kundi sleppast frá, at so verður skipað, og at tað ikki bar vel til, at tað ár undan fári kunu bønarbrøv inn á ting, hvar fólk biðuc um, at presthaldið verður hækkað.

O. Effersøe: Jeg maa indtrængende tilraade Tinget ikke at vedtage det foreliggende Forslag, for det indfører en ny Praksis, hvis Følger ikke er til at overskue. Som Forholdene nu er, synes det, at Præsten er berettiget til paa sine Tjenesterejser at faa frit Ophold i Henhold til en Bestemmelse i norske Lov. Det maa være Menighederne, som skal betale det, hvilket er naturligt. Angaaende hvorledes Præstholdet er blevet indført, tænker jeg mig, at det er noget, man har fundet naturligt og praktisk at yde de Menigheder, som har Byrderne ved de tvungne Tjenesterejser, et forholdsvis Tilskud. Dette maa være Princippet for den nuværende Ordning. Den Ordning, som Udvalget foreslaar vil komme til at faa vidtrækkende Konsekvenser, da denne maa opfattes saaledes, at Tinget erkender, at det er pligtigt at underholde Præsterne paa deres Rejser. Her skal der betales af Tingets Kasser for alle Rejser, som Præsterne gør, ogsaa hvor en enkelt Mand har krævet Præsten til at komme, naar det blot er i Embeds Virksomhed. Det ser ikke saa farligt ud, at man begynder med at betale pr. Dag. Men har man først sagt A, maa man ogsaa sige B. Det hjælper ikke tilstrækkeligt, at man siger, at dette skal kun gælde 2 Aar; for man er da allerede kommen ind paa en Skik, som Folk ikke vil slippe. Nogle mener, at det man være Præsterne, som betaler deres Ophold selv. Det kan jeg ikke give min Tilslutning. Dog kan det maaske være saa, at denne Betaling i Virkeligheden er at forstaa som Diæter, der ydes Præsterne, og hvad der kræves ud over dette, maa enten betales af Menighedem eller af Præstem. Hvorledes dette skal ordnes ved jeg ikke, men Tinget maa ikke gaa med til en Forpligtelse, som strækker sig ud over de ordinære Rejser og heller ikke maa Tinget gaa med til en Forpligtelse, som binder Tinget til at betale fuldt Vederlag for disse Rejser. Tinget kan afgøre, om Præstaholdet skal gøres større; men det er noget andet end det foreliggende Forslag. Og her kan man overse, hvad det hele koster. Jeg holder meget af, at Præsterne kommer ud til deres Menigheder, men jeg finder ikke, at Tinget skal betale dette. Et Forhold, som man maaske kan nævne i denne Sammenhæng, er dette: Er man først kommen ind paa, at Tinget skal betale Underhold for Præsternes Rejser, saa maa der ogsaa betales for enkelte Præster, som vel rejser i Embeds Virksomhed, men tager sig megen Tid og opholder sig længe ude i Menighederne, fordi det passer dem saaledes. Dette Forhold er maaske en Undtagelse, man kan vel nævnes. Er man først kommen ind paa det Princip, at Lagtinget skal betale Præstehold, kan man vel ogsaa komme til det, at Lagtinget overhovedet skal betale Præsternes Omrejse. Jeg har ikke fremsat noget Forslag angaaende dette Spørgsmaal, men jeg kunde tænke mig, at om man ikke vilde sætte Præstebidet op til det dobbelte, at man saa dog forhøjede det med f. Eks. 50 pct. Jeg vilde være glad ved at høre, om der er nogen, der slutter sig til denne Tanke. Man maa paa ingen Maade slaa det fast, at Tinget skal betale Præsternes Rejser.

R. Nielsen: Eg má í dag fult út slutta meg til mín æraða síðumann, hr. Effersøe, og fasthalda, at vit mega ikki lata nýggjar útreiðslur fara úr kirkjukassunum. Fyri nøkrum árum síðani vóru vit ikki samsintir í einari líknandi sak; tá var tað tala um at geva pening úr kirkjukassunum til eina stóra nýggja kirkju, tó at eingin peningur var til, og tá var hr. Effersøe við til at lata henda pening. Eg kann ikki vera við til, at kirkjukassarnir skulu betala prestanna umreiður; vilja meiningheitirnar hava prestarnar, vilja tær óivað eisini betala fyri at fáa teir til bygdina. Eg má halda fast uppá tað, at eingin nýggj útreisla má fara úr kirkjukassanum, fyrr enn vit hava fingið skil á teirra peningastandi.

Prósturin: Tað hevir ivaleyst frá gamlari tíð verið siður, at prestarnir á teirra umferðum fingu frítt upphald. Hví

er tað broytt? Og hví hevir løgtingið tikið sær fyri at betala nakað ávist um árið sum studning til presthalds. Hetta er ógvuliga gamalt. Vit skjóta ikki uppá nakað nýtt í novndini, vit vilja bara hava hetta forhold, ið nú er, uttskipað so tað verður meira rottferdugt. Eftersøe er bangin fyri, at hetta skal verða til eitt forpliktilsi, ið skal koma at hvíla á tingjurum; tingið er sum nú er forpliktað til at betala til presthalds; so má tingið tá heldur heilt taka hetta av. Táið kirkjukassarnir sortera undir løgtingi, og presthaldið deilvís varður betalt úr hesum kossum, so er hetta einki nýtt forpliktilsi ið verður nú lagt á løgtingið. Tað einasta, ið kann vera nakað betoinkiligt, er, at hækka presthaldið; har vil Eftersøe vera við til at hækka við 50 pct., men so vil útreislan vera nakað tað sama sum nú, prestarnir vilja forðast nakað tað sama sum nú, og táið eini tvey ár eru gingin, vilja vit lætt siggja, hvat útreislan verður.

S. P. úr Konoy: Sjálvandi er hetta eitt ivasamur spurningur, vit eru komnir inn á, men eg ma halda tað fyri vist, at higartil hevur løgtingið goldið fyri undirhald prests. Tá Andrias Evensen í sínari tíð reisti honda spurning, var tað fyri her at skapa rættferð. Bygdir eru verðnar størri enn tær vóru fyrr, sumar eru vaxnar skjótari enn aðrar, og tær bygdir, ið eru størri, hvar meiri er at gera, og hvar presturin tí má stoðga longur, hava krav uppá ein størri studning enn hinar smáu. Eftir Eftersøes uppskoti skal latast tað sama í presthald til Klakksvíkar sum til Mikladals, á Tvøroyri sum í Sumba. Tær hava higartil fingið 12 kr. um árið í presthald, tað er sjálvandi nógv ov lítið, og vit hava viljað bætt um hetta, at tað skal gevast inn rokning yvir tíðina, prestur hevir gist hjá viðkomandi manni, at gjalda eftir ásettari taxt. Nakað annað er, um tingið vil sláa inn á ein nýggjan sið, har eri eg nakað meira botoinkiligur, men skal tað vera, má eg halda við próstinum, at hetta má vera tað fyrsta vit gera, at fáa bætt um hetta órættvísi. Vit gangn ikki burtur frá tí princippi ið nú ræður, og eg havi ikki tráð, at tingið vildi inn á nýggjan veg í hesum spurningi. At presturin sjálvur skal gjalda sína umferðir, er ikki heldugt, teir vilja so vera interesserаðir í at vera heim so nógv sum møguligt. Tað er heldur ikki gott at geva teimum eitt bestemt bolop at forðast fyri. Eftersøe skovt uppá, at meinigheits ráðini skuldu betala, ja, tað er ein góður vegur, men so eiga vit at taka hesar 12 kr. um árið aftur.

O. Efterso: Hovedspørgsmaalet er, om der ved Udvalgets Forslag vil blive indført en ny Skik. Her har baade Konov og Provsten sagt, at Lagtinget har betalt Præsternes Omrejse, det er ikke rigtigt. Lagtinget har betalt Tilskud, og det har ikke været tilstrækkelig Betaling for Præstens Ophold, selv om man indskrænker det til de 6 Tjenesterejser. Der er nogen, der har betalt Resten, enten Præsten eller Menigheden, eller enkelte Personer indenfor Menigheden, maasko vel oftest det sidste. Saaledes er Sagen i Virkeligheden. Nu kommer man ind paa et andet Princip, nemlig det, at Lagtinget skal betale; er man først kommet ind paa det, saa kommer vi snart, med de Priser, der nu forlanges paa Bygderne, op paa en 5—6—7 Kr. om Dagen i Præstehold. Konoy siger, at der, hvor Præsten er i lang Tid, kræves større Tilskud end hvor han kun standser kort; ja, det er rigtigt; men hvem skal betale det? Jeg mener, i hvert Fald ikke Lagtinget. Hvorledes dette Tilskud til Præsthold er opstaaet, ved jeg ikke, men jeg kan antage, at nogle Menigheder har været stærkt belemmede, om jeg maa bruge det Udtryk, ikke med Præsten, men med Udgifter til hans Omrejse, og saa har man anset det for rigtigst at hjælpe lidt herpaa. Til Bygder, hvor der bor en Præst, betales jo intet Tilskud. Jeg har hørt, at der i et bestemt Tilfælde skal være udbetalt 24 Kr. i Stedet for de fastsatte 12 Kr. Dette finder jeg meget urigtigt; saadanne Regninger bør ikke betales.

I øvrigt glæder det mig at konstatere, at det er 2den Gang Hr. Rasmus Nielsen og jeg er enige i et Spørgsmaal, hvor vi begge har fuldstændig Ret. I et Tilfælde var vi ikke enige, det var Kirken i Husum; her var han heldigere end jeg. Den Sag tjente for mig til at bekræfte Rigtigheden af, at man, før man gaar med til en Bevilling, bør kende dens Størrelse, hvad jeg tidt nok har fremhævet. Man Hr. Nielsen ved nok, at der er ingen Regel uden Undtagelse, og dette var en saadan.

Naar Rasmus Nielsen iøvrigt mener, at Kirkekasserne er insolvente, saa stemmer det ikke med den Status, vi har liggende for os; saa maa det skyldes noget, der er hændt senere — mat jeg skal ingen Ting sige.

S. P. úr Konoy: Tingmaðurin á Tvøroyri hevur her funnið út nakað, sum er

ganska nýtt. Hvarfrá fær hann hetta »tilskotið« til kirkjuverjarnar? Her hevur ikki verið talan um nakað slíkt »tilskot« fyrr. Hesar 12 kr. um árið váru ásettar til kostarhald fyri prestin, 2 kr. um dagin. Tað var hildið fyri at verið nógso góð betaling í teirri tíðini, tað fekkst fitt av mati fyri tað. Skal tingið koma burt frá prinsippinum at veita undirhald til prestarnar, tá teir eru á umreisu, so mugu vit siga við meinigheitsráðini, at tey nú hava við hetta at gera. Soleiðis sum sakin fyriliggur nú, haldi eg tað vera beint at hækka presthaldið, so tað verður meira rættferdugt. Annaus mugu vit útseta sakina og spyrja meinigheitsráðini um tey vilja taka sær av hesum.

Poul Nielasen: Ífjor fyrilá eitt úttalilsi frá Norðstreymoyingum, hvar teir søgdu, at viss teir ikki fingu presthaldið hæðkað, so vildu teir ikki taka ímóti prestinum meir. Eg úttalaði mig tá um honda spurning, og eg havi ikki forandrað mína stoðu síðani. Eg haldi tað vera heilt ótíðssvarandi at Føroya løgting skal avhalda útgiftirnar til kostarhald fyri prestarnar. Teir eru so væl økonomisk avlagdir nú, at teir sjálvir mugu kunna avhalda, hvat tað kostar. Konoy søgði áðni, at hann ikki var vissur í um prestarnir fóru at ferðast so nógv, vies teir sjálvir skuldu betala sín kost. Eg vil tó ikki hopa, at tað skal hava nakran ávirkan á okkara prestar og teirra ídni í tænastuni; her mugu væl aðrar grundir vera medvirkandi. Løgtingið eigur, í hvussu er ikki at vera bundið av honsýni til, um kostarhaldið til ein prest kostar 3 ella 4 kr. um dagin. Eg haldi fremdeilis, at prestarnir eiga at betala sítt kostarhald sjálvir. Tað eru skúlalærararnir, sum tó eru betýðiligt verri avlagdir økonomisk, neyddir til, tá teir ferðast millum bygdir.

dette, at Lagtinget til Fordel for Kirkekasserne har inddraget de Godtgørelser, som tidligere tilfaldt Kirkeværgen, kunde tyde paa, at Tinget havde en vis Pligt til at erstatte ham Præstholdet. Noget kan det vel hjælpe at forhøje Præstholdet, men helt godt bliver det ikke med denne Ordning. — I øvrigt er jeg ikke bange for, at Menighedsraadene nok vil sørge for, at Præsterne faar det Logi og den Føde, de skal have.

O. Effersøe: De 12 Kr. er ydede uden Hensyn til, om Præsten opholder sig paa samme Sted flere eller færre Dage, denne Ydelse er ikke bygget paa, at Lagtinget skal betale Præstens Underhold. Lad Menighedsraadene selv afgøre det med Præsterne. Det er slet ikke altid Kirkeværgerne, der har underholdt Præsterne; de har gerne været ansete, velholdne Mænd i sit Sogn, og har derfor ganske naturligt modtaget Præsten, naar han kom paa Omrejse, men det var slet ikke altid i Egenskab af Kirkeværger. Paa sine Steder har det været helt andre Personer, som har faaet den af Lagtinget fastsatte Godtgørelse for Præstehold.

S. P. úr Konoy: Í Eysturoynni og í Norðoynum — tað er tó eitt stórur partur av Føroyum — hava prestarnir gjort vanligar 6 reistir um árið og kostarhaldið er eftir tí mett til 12 kr., sum tá var hildið at vera passandi. — At nakar tingmaður skal troysta sær til at fyrisláa, at prestarnir skulu syrgja fyri sær sjálvum, tí skúlalærararnir eru neyddir til tess, tað undrar meg. Nei, komið so heldur og sigið beint út, hvat tit meina um prestarnar! Lat vera at ein standur herheima er hildin niðri. Tað skuldi tó ikki verið grund til at trekkja ein annan niður við. Tað haldi eg vera tappmálið at krevja slíkt.

J. Poulsen: Saavidt jeg har bragt i Erfaring har det fra gammel Tid været Skik, at Kirkeværgerne modtog Præsterne og paa adskillige Steder har det i hvert Fald været saadan, at Kirkeværgerne har boet hver i sit Sogn, saa at Præsten paa sin Gennemrejse overnattede hos dem begge. I tidligere Tid gav Stillingen som Kirkeværge en Del af sig; han modtog jo forskellige Tiender og nød naturligvis en vis Andel deraf; særlig ved Grindefangst, hvor Kirkens Andel af Tienden ofte løb ret højt op, kunde det betyde noget for Kirkeværgen. Efterhaanden har jo Lagtinget inddraget de forskellige Godtgørelser for Tienden, og

Poul Nielasen: Tað er merkiligt við tingmanninum fr Oslu, at hann altíð skal referera skeivt. Hann forvrengar míni orð aldeilis. Tað eg segði var, at eg fann tað líka so naturligt at prestarnir sjálvir betaltu fyri kost og uppihald, sum at lærararnir skuldu vera neyddir til tað.

Prósturin: Effersøe vil halda fast við, at hesar 12 kr. eru eitt tilskot og einki annað. Men eg dugi ikki at siggja, at hann her góða grund fyri tí. Hann sigur, at 12 kr. var ovlítið sum viðurlag, og eg má geva honum viðhald. Sum viðurskifti og prísir hava verið, var mann væl tilfriðs við at

fáa tvær krónur fyri kostin, men eftir nútíðar prísi er tað ov lítið. Prestarnir ferðast meiri nú enn fyrr, eisini av tí, at summar bygdir eru vaksnar nógv. Tað gamla lagið var, at prestarnir fóru sínar vanligu ferðir. Tað var 6 ferðir. Og eftir tí er væl prestahaldið verðið roknað. Nakað sikkurt um, at hetta er tilskot, kann man ikki siga. Heldur er tað eitt viðurlag, sum kirkjukassin hevur latið. Eg vil ikki tala um prestalønina. Hon er hvørki støri ella minni enn so, og fáir embætismenn vildu býtt við prestarnar.

O. Effersøe: Det har utvivlsomt gennem Tiderne forandret sig, hvad Præstholdet har kostet. Men Betalingen har været uforandret den samme.

S. P. úr Konoy: So vítt eg havi hoyrt, skulu prestarnir ferðast 6 ferðir um árið til hvørja kirkjubygd. Men til útoyggjar sum Fugloy og Mikines gera teir vist ikki meiri enn 3—4 ferðir. Tað normala er 6 ferðir um árið. Hetta talið er ov lágt nú til dags. Tað var A. Evensen, sum reisti hesaa spurningin og síðani kom sami spurningurin úr Norðstreymoy. – Poul Niclasen má brúka hvørji orð hann vil. Eg standi við tað, og segði.

J. J. Weihe: Eg trúgvi ikki, at hesar 12 krónurnar kunnu bøtraktast hart sum tilskot. Fyrr var hetta ivaluysa nógv. Tað er ikki so langt síðani, at tað var hildið nóg mikið, um fólk lot 50 oyru fyri ein dags kost. Eg haldi, at tað er óratt, at bygdir, sum ikki eru kirkjubygdir, einki skulu fáa. Tað kann forvolda, at presturin ikki er so fegin at koma til slíkar bygdir.

P. Niclasen: Tað kann vera, at eg ikki úttalaði meg so klárt. Men mín meining var ikki tann, sum Konoy vil hava hana at vera. Eg helt, at tað ikki var beint, at prestarnir skuldu hava hetta gottgerilsi, tá ikki sýslumenn fingu nakað gottgerilsi.

M. Samuelsen: Poul Niclasen sagði, at Norðstreymmingar vildu ikki hava prestin utan at fáa fyri tað. Grundin lá í manninum í Haldórsvík, sum her meinast við er at skulu vit fáa nakað, so skulu vit fáa nakað forholdsvís sum tað kostar. Tí 12 kr. í hesi tíð, tað er einki. Har, sum eg eri, ganga teir út frá, at hetta ikki er tilskot, men viðurlag. Eg vil fyrr hava prestin fyri einki enn hetta heiti frá tinginum. Eg hugsi ikki, at prestur hevði verið útihýstur, um man einki fekk afturfyri hansara upphald. Men skal tað vera nakað afturfyri, so skal tað eisini vera nakað. Hetta uppskotið frá kirkjukussanevndini haldi eg seta framm ein rottvísan ordning. Man sigir, at tingið skal ikki binda seg til nakað. Eg haldi, at tingið longu er bundið við tann ordning, sum er. Eg kann ganga við at stemma fyri nevndaruppskotinum. Eg vil minna um, at prestarnir eisini gista í bygdum, sum ikki hava kirkju, og at tær einki hava fingið afturfyri.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur mánadag 8. september.

Samtykt viðv. kommununvali í Gásadali.

2. viðgerð.

Ordføraren (Konoy) greindi frá nevndarálitinum, ið bað tingið staðfesta tað uppskot til samtyktar, ið var fyrilagt tingi, og samtykkja, at sóknarstýrið í Bø skuldi eiga skyldu til at ansa, at altið minst 5 eintøk av samtyktini vóru í sóknarskjalasavninum.

Uppskotið varð samtykt.

Skattaklaga frá Poul Jensen, Sunuba.

2. viðgerð.

Ordføraren (Konoy) greindi frá nevndarálitinum, ið mælti til, at tingið ikki kundi samtykkja at minka um tann álíknaða skattin.

Hetta varð samtykt.

Skattaklaga frá Peter Müller, Kvívík.

Ordføraren (Konoy) greindi frá nevndarálitinum, ið mælti til, at tingið ikki kundi samtykkja at minka um tann álíknaða

skattin. Undirrit framhildt hann, at nevndin meinti, at Rudolf Müller hevði ov lítlan skatt, men tá einki uppskot var framsett av sóknarstýrinum um at hækka skattin, skuldi nevndin einki skjóta upp um hetta.

A. Samuelsen: Eg vil hava lov at retta ein spurning til orðføraran í hesi sak. Orðføraríð refererað, og tað standur eisini í nevndarálitinum, at hesin maður hevir haft eina serliga inntøku av seyði og neytum. Eg vil spyrja, um hann ikki hevir haft hesa inntøku saman við vernumunni síni, ið hevir serligan skatt. Viss forstandarskapið hevur rætt í tí, at hesin maður hevur fortjent so nógv við útiróður seinasta ár, hevur hann ikki fornógvan skatt. Eitt annað er, at hann hevur ovnógvan skatt í forhold til hinar skattaborgararnar; tað ivist eg ikki í. Hann er meira beskattaður enn aðrir menn í Kvívíks sókn. Tað er fyrr gjørt geldandi, at sjálvt um ein maður átti at borið allan skattan í forhold til sína inntøku, so verður tó ikki allur skatturin lagdur á hann. Vit fara at taka sama hensýn her. Táið hann samanlíknar seg við ein mann haðani, sum hevur ligið á sanatorinum, so er tað rætt nokk, men hetta liggur fleiri ár tilbakar. Nú er tað so heldugt, at vit hava ein løggovning, sum berættigar okkum til at taka hensyn til «Formue og Lejlighed». Viss tað ikki var, kundi maðurin ikki havt uppstillað tað so skomatisk sum útvalgið her hevur gjørt.

Edw. Mortensen: Hr. Samuelsen siktaði til skattalóguppskotið, logtingið samtykti ífjør. Tað viðvíkur ikki kommunuskatti.

Formaðurin: Jeg skal advare imod, at man gaar udenom Sagen og kommer ind paa almindelige Skattoprincipper. Det vil let føre for vidt.

A. Samuelsen: Vit eru her nettupp inni á einum bestøntum skattasystemi, so og máttu væl hava lov til at seta fram tað, eg sagði. Eg veit væl, at skattalógforslagið ífjør ikki umfatað kommunuskatt, men vit hava í forbindilsi drøftað skattaprincippir, hvr og haldi tað er rætt at líkna eftir formúu og lejligheit. Tað var tá sagt, at tað ikki var heldugt, at forstandarskapini hevdu ov fríar hendur, men hetta vísir nettupp, at tað er ógviliga heldigt.

Edv. Mortensen: Tingmaðurin í Fuglafirði hevur í Danmark stemmað fyri eini skattalóg viðvíkjandi skatti til statin, ið bygd var á sonn princippum, sum fram vóru hildin í logtingsins uppskoti, og ikki á princippinum formúu og lyligheit.

S. P. úr Konoy: Hvussu tað forheldur seg við svigarmóður hansara, veit eg ikki; hon er væl beskattað eftir síni jørð. Eftir teimu upplýsingum, sum fyriliggja, er hesin maður væl ístand til at bera 60 kr. í skatt; forstandarskapið kallar hetta «bagatellere». Øll hansara viðurskiftir eru á tann hátt, at 60 kr. er einki at lata fyri hann. Men sjálvsagt hevur beiggi hansara ovlítið í skatt. At hann henvísir til henda Niels Nielson, sum hevur ligið so leingi á sanatorijnum, tykist mær bara svokkar hansara sak.

A. Samuelsen: Hvussu eg havi stemmað niðri í Danmark, skal eg ikki kunna siga, tí og minnist tað ikki, men tað veit eg, at justitsministarin avgjørt tekur avstand frá teimum princippum, sum liggja til grund fyri skattalógforslagnum ífjør.

Edw. Mortensen: Av tí, sum liggur her fyri tinginum, framgongur einki um, at justitsministarin meinar, at princippini í okkara uppskoti eru verri enn tey, ið liggja til grund fyri amtsrepartitiónsfondspálikningunum.

A. Samuelsen: Hvussu ministarin motiverar sína afturkastan av løguppskotinum, veit eg ikki, men hann hevur harvið sagt, at princippið dugir ikki. Tað veit eg.

Edw. Mortensen: Brævið sigur einki um, hvørji princippir, ministarin meinar, vit skulu skatta eftir skjøn ella fastari skala.

A. Samuelsen: Eg havi nú lisið tað uppá tann máta, at ministarin sigur: Hatta grundarlagið er ómogutligt.

M. Samuelsen: Eg vil eisini nerta við hesa skattaklagu. Tað er rímiligt, at tað ikki ber væl til at seta skattin niður, men sum maðurin sigur, eru hansara inntokur nógv minni enn, hvat forstandarskapið upplýsir, og heilt ignorera hansara uppgávu kunnu vit væl ikki. Tað mesta or tó forholdið millum hann og beiggjan. Tekur man inntokum frá, sum svigarmamman hevur, so skuldi Rudolf Müllar verið betri stillaður. Hesin Petur Müllar giftist í heldur ungum aldri, meðan Rudolf ikki giftist fyrr enn hann var upp ímóti teim 50, og hevði visst tá samlað stóran

pening. Merkiligt nokk sýnist forstandarskapið at vilja brossa við at hava hetta misforholdið úr undan ári. Eg forstandi tað ikki Hini forholdini komni eg ikki, men eg vildi hildið tað verið meira rættferdugt, um Rudolf Müllar fekk meira skatt og Petur Müllar minni.

S. I. úr Konoy: Mikkjal Sámalsson er í so máta samsintur við mær. Nú er tað tó eitt nýtt forstandarskap við einum formanni, sum eitur Niclas Jacobsen, og tað hevur sett hann í sama skatt sum hitt fyrra setti hann í. Eg kann ikki trúgva, at Petur Müllar er genstand fyri forfylgilsi frá tveimum forstandaraskapum. — Ífjør fyrisløgu vit at niðursetа skattin, í ár hava vit indirekta fyrisligið at seta Rudolf Müller upp í skatt.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Skattaklaga frá J. M. Egholm.

2. viðgerð.

Orðføraríu (Konoy) greiddi frá nevndarálitinum.

Vit meina, at tað er eingin grund til at niðursetа henda skattin uppá 30 kr. Her er jú talan um ein mann, sum er vanliga arbeiðsdyktugur.

M. Samuelsen: Tað er eitt minni heldugt úttrykk, sum forstandarskapið hevur brúkt viðvíkjandi orðinum »straffskata«. Eg havi talað við forstandarskapsformannin, og forhaldið er tað, at tað vóru komnar fleiri skattaklagur inn, sum allar vístu á, at hesin maðurin — Kristian Olsen — hevði ov lítlan skatt. Forstandarskapið lætur hann tá vita, at klagararnir meintu, at hann hevði ov lítið í skatti og biður hann at uppgeva sína formúu, men tað ger hann ikki. So tekur forstandarskapið 20 kr. frá einum øðrum manni og leggur tað yvir á Kristian Olsen; tí forstandarskapið fann, at hann hevði so mikið lættan skatt, at hann kann bera 20 kr. aftrat. Hetta er ikki at forstanda sum útilukkandi straff. Hvat viðvíkir J. Martin Egholm, so finni eg, at forholdið ikki er sum tað eigir at vera. Johan Jacobsen hevur 2500 kr. í inntøku og hann hevur ikki meir enn 10 kr. í skatti, meðan skattaklagarin hevur 30 kr. í skatt og ikki meiri enn 1600 kr. í inntoku. Hetta er undarligt, og tað vekir forargilsi, at av monnum, sum sita við líka nógvum inntokum, hava summir bara hálvan skatt. Men tað batar jú ikki at tala so mikið um hetta, tí tað er vanliga so, at tað, sum nevndin setur uppá, tað verður avgjørt.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Broyting í bygdaskúlaskipanini.

3. viðgerð.

Prósturin (orðferari): Tað er talað so nógv um hesa sak bæði við 1. og 2. viðgerð, at eg hugsi, at tingmenninir eru áttaloðir. Eg skal loyva mær at biðja tingið samtykja tað uppskot, sum er borið fram av fleirtalinum í nevndini.

Jørn Poulsen: Jeg vil sige, at det forekommer mig, at det Svar, som er foreslaaet af Flertallet, ikke indeholder tilstrækkelige Oplysninger. Ministeriet har forlangt sagl ige Oplysninger, som jeg synes Tinget skuldo svare paa. Mindretallet har sendt disse Oplysninger. Jeg vil anbefale Mindretallets Forslag og bede om, at der bliver stemt ved Navneopraab.

Nevndaruppskotið hjá fleirtalinum varð samtykt.

Fundur tíslag 9. september.

Prestalnið.

3. viðgerð.

Orðføraríu (prósturin): Eg vóni, at tingið vil samtykkja tað uppskot, ið er sett fram av kirkjukassanevndini í hesum máli. Eg haldi, at vit kunnu ikki væl fata slíkt bonarbrøv sum hetta kunna inn úr undan ári, uttan at royna, at koma til eitt úrslit. Annaðhvørt má hetta skipast á ein

rættvísari hátt ella má hesin studningur úr kirkjukossunum heilt strikast. Vit hava roynt í nevndini at fáa hetta í eitt betri ella rættvísari lag enn higartil, og skal og mæla til, at tingið samtykkir okkara uppskot. Skuldi tað víst seg, at hetta ikki er leiðin, men at tað ern betri máttar at skipa fyri hesum, kann sakin verða uppaftur tikin um tvey ár, sum nevndaruppskotið tilskilar.

Joen Poulsen: Jeg havde tænkt at stemme for dette Forslag, men ved endnu en Gang at læse det, kom jeg til at tænke paa forskjellige Forhold, som jeg ellers burde have fremdraget ved anden Behandling. Hvorledes skal man forholde sig med Tilskuddet, naar Præsten kun standser en Times Tid? Det kan træffe sig, at Præsten kommer om Formiddagen og rejser igen om Eftermiddagen. Der er andre Bygder, hvortil Præsten rejser med Skyds. Nogle Steder har Præsten Embedsforretninger og standser længere. Nu er det Spørgsmaalet: skal der betales Vederlag hver Gang Præsten overnatter eller hver Gang han standser paa Stedet?

Prósturin: Tað er sjálvandi nakað ringt at seta mark fyri hvussu lanqa tíð tað skal gjaldast fyri. Vit rokna í uppskotinum ein dag fyri eitt samdogur, men um ein prestur stedgar ein hálvan tíma, krevst sjálvandi einki viðurlag.

O. Effersøe: Jeg vil tillade mig at henvise til mine Udtalelser ved første Behandling. Ellers vil jeg kun sige, at jeg frygter for, at om dette Forslag vedtages, vil der lægges betydelige Byrder paa Tinget i Fremtiden. Ifølge Norske Lov 2det, 12te og 10de, er det foreskrevet med Hensyn til Præsternes Tilhold, at Bønderne ikke maa nægte dem saadant, naar de rejser, og der siges, at Almuen skal skiftes til at befordre Præsterne og underholde dem paa deres Omrejse. Dette Forhold er maaske gennem Tiderne en Del ændret, og jeg synes, at det maa være saadan, at Præsterne selv maa bekoste deres Rejser; dog maa i hvert Fald ikke paahvile Lagtinget. Om dette Forslag bliver vedtaget, vil vi ikke i Fremtiden slippe med at betale 3 Kr. pr. Dag. Det er blevet sagt, at Præsten kommer meget hyppigt til Klaksvig, for blot at tage et Eksempel; lad os sige, at han kommer der 40 Gange om Aaret, saa skal der altsaa betales 120 Kr.

Prósturin: Eg dugi ikki at fata, at hetta skal vera eitt forpliktilsi, ið skal nú leggjast á tingið; og haldi tað vera eitt forpliktilsi, ið liggur á tinginum, við tað, at kirkjukassarnir nú luta oin ávísan pening til hetta endamál. Prestarnir hava frá gamlari tíð ferðast frítt, og eg trúgvi, at fólk lugsar so: at prestur skal kunna ferðast frítt, og vit skulu bera byrðurnar við teirra lutning, og presturin skal ikki hava peningaávtreislu av at stedga í embætisforretningum, og tað skal ti aftur samsýnast teim monnum, ið taka ímóti prestinum. Løgtingið hevir í sínum høndum til hvørja tíð at áseta, hvat tað vil lata. Táið vit seta útreisluna til 2 kr. um dagin, rokna vit ein dag fyri eitt samdogur.

O. Effersøe: Jeg vil gerne spørge Provsten, om dette Spørgsmaal bygger paa Erkendelsen af, at Lagtinget er forpligtet til at betale Præsternes Rejser i Embeds Medfør, og om hvad der er Lagtingets Forpligtelse i Henhold til det fremsatte Forslag.

Prósturin: Eg meini, at løgtingið við at lata pening úr kirkjukossunum hevir átikið seg eitt forpliktilsi til at lata eitt viðurlag fyri at hýsa prestunum á teirra umreistum.

O. Effersøe: Det er altsaa nu klart, at Lagtinget nu har Forpligtelse til at betale Præsternes Omrejse, ligesom det altsaa har haft det tidligere. Dette Forhold har ikke været fremdraget tilstrækkelig klart under Sagens Behandling.

S. P. á Kongi: Tað undrar meg, at man ikki hevir haft hetta inntrykk undir hinum viðgerðunum av hesum máli. Vit í nevndini hava ikke kunna uppfatað tær 12 kr. árliga sum ein studningur, og tingmaðurin úr Haldórsvík, ið hevir haft nógv við slíkt at gera, hevir eisini hildið fram, at hann meinti eisini, at hetta var ikki studningur, men eitt lítið viðurlag. Tað er nakað annað, ið og haldi er meira at finnast at: Prestarnir hava frían ferðapening til Havnar á óhavsoku; tað er meira at ivast í at luta tann pening burt fyri at teir kunnu sita í kórinum og hoyra ein annan teirra predika. Eg veit, at tingmenn hava tikið 50 kr. fyri at koma úr Havn til Suðuroyar, eg veit ikki, hvussu nógv prestar hava tikið, men og haldi at hesin peningur er meira ivasamur at luta enn hetta viðurlag, ið her er tala um.

Prósturin: Eg skal bert upplýsa, at teir prestar, ið fáa frían ferðapening til Havnar, eru bert tveir, hann, ið skal prae-

dika og tiltaksprostarin, og peningurin verður goldin úr amtsrepartitiónsfondini.

J. Patursson: Eg vil bara siga frá, at eg ætli mær at stemma fyri nevndaruppskotinum, og hví tað er, er tí, at eg ikki sum Effersøe haldi tað vera nakað nýtt, men nakað, ið altíð hevir verið. Hevði tað verið, at her kom eitt nýtt uppskot um hetta, hevði eg óivað gingið ímóti. Eg havi líka gott álit á norsku lóg sum Effersøe og mær dámar altíð væl, hvørja ferð tað kann ávísast, at norska lóg er okkara høvuðslóg. Eg vil tí stemma fyri hesum uppskoti, tí hetta skipanin er gomul og ikki nakað nýtt.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Viðurskifti viðv. „Smirli".

3. viðgerð.

Orðføraríð (R. Nielsen) greiddi frá nevndarálitinum og broytingaruppskoti nevndarinnar, og mælti til, at tingið samtykti tey.

A. Samuelsen: Millum tað, ið tosað var við 2. viðgerð var eitt punkt, sum eg ynskti týðiliggjørt, nemliga við hensýn til reiðaran og hansara honorar, sum vit hava avtalað um. Eg tosaði tá við orðføraran um at koma fram við einum forslag, hvarav tað týðiliga fram gekk um støddina av hesum honorari og eg forstóð hann sum hann vildi koma við tí. Tað er ikki, og nú standi eg við endringsforslag frá einum øðrum tingmanni í nevndini og mær sjálvum, men fyri so víst vit allir eru einigir um hesar 2000 kr. ætli eg ikki at framleggja tað, tí so bevíst tað ikki, meu skuldi tað verið nakar tvívl um hetta, so framleggja vit tað fyri at halda okkara stilling klára. — Viðvíkjandi fraktforhøjilsi vil eg siga, at tó at eg ikki í sínari tíð var við til at stemma fyri tí, vil eg nú, aftaná tað sum er passerað og vantast kann at passera í framtíðini, ikki mótseta meg tað, sjálvum eg ikki trúgvi, at tað vil verða neyðvendugt at forhøja taxtirnar.

R. Nielsen: Viðvíkjandi lønini til reiðaran, so eri eg av tí meining, at vit allir eru einigir um at halda uppá tað honorar, ið talan er um, men tað er væl nakað, vit kunnu tilføra forhandlingsprotokolini eins og við øðrum lønum. Eg ætli ikki at ganga frá hesum 2000 kr. fyri mítt viðkomandi, hinur kann eg ikki so gott svara fyri. Hvatíð taxtunum viðvíkur, so er tann krisa, ið verið hevur við manuskupið, bílogd, men tað kundi ikki undgangast, at hon mátti enda við eini nógso stórari útgift fyri veruhandilin; kontraktin er bindandi til 1. juni. Tað verður tí neyðvendugt, viss vit skulu kunna standa okkum at hækka taxtirnar bæði fyri varur og passagerar. — Um lønina tørvar einki endringsforslag.

A. Samuelsen: Eg gangi útfrá, at orðføraríð talar fyri heila tann partin av útvalginum, sum eg ikki eri talsmaður fyri, so eg ætli ikki at framleggi tað endringsforslagið, og her standi við í hondini.

R. Nielsen: Eg trúgvi, at eg tali uppá hinar útvalgslimanna vegna, men tað er jú ikki sikkurt, at teir, sum eventuelt koma at verða í einum seinri útvalgi, samtykkja tað.

N. Debess: Eg vil loyva mær at stilla eina spurning til Andr. Samuelsson. Hann segði við aðra viðgerð, at tað var óneyðugt at hækka taxtirnar, tí um »Smiril« skuldi givið undirskot, so kundi vøruhandilin altíð dekka tað. Er tað meiningin, at hetta eru grundirnar til, at A. Samuelsson ikki vil hækka taxtin? Mær týkir, at hann harvið hevur ivaromma, at tað er neyðugt at hækka. Eg vildi gjarna fingið svar uppá henda spurning.

A. Samuelsen: Til tingmannin í Miðvági vil eg siga, at eg havi ikki forstaðið tað sum eitt kommandi útvalg skal fastseta hinina; eg gangi útfrá, at vit fastseta hana. Jógvan Rasmussen og eg standa fast uppá at tað bolopið, sum ásett er, ikki verður frávikið og her eru vit samsintir við okkara partí. Eg forstandi Rasmus Niclasen á sama máta, og á tað ganga vit við til útvalgsins forslag. - - Tá Nyholm Debess tilletar sær at fortolka míni orð so, at eg havi erkennt, at tað er neyðugt at hækka takstirnar, tó eg havi sagt, at tað ikki er neyðugt, so er tað vanskiligt hjá mær at svara honum. Tí tað kundi jú tonkast, at hann við eina og hvørja aðra høvligheit fann uppá, at fortolka mítt svar beint tvørtímóti tí, sum eg hevði meint, og leggja nakað í tað, sum eg aldri hava tonkt.

N. Debess: A. Samuelsen segði: Skuldi tað vist seg, at »Smiril« gav undirskot, so kunnu vit jú taka teir neyðvendugu pengar

til dekning frá verulhandlinum. Eg má halda fast, at hann hervið á ein hátt hevur innrommna, at tað vil verða neyðugt at hækka tøxtirnar, um »Smirila ikki skal geva undirskot.

A. Samuelsen: Eg vil innrømma, at eg havi sagt, at man *kundi* gera tað - - eitt annað er, um man vil gera tað. Verulhandilsins yvirskot ræður løgtingið fultút yvir; tað er ein amtskommunal fyritøka. Tað vil vera tað sama sum tann ordningur, vit høvdu við A/S. Mortonson, vit søgdu við teir: Fyri tær varur, tit hosyrgja fyri okkum vilja vit geva tykkum 100 pct.

N. Debess: Hesi úttalilsir prógva, at Andrass Sámalsson ikki er heilt sikkur í, at »Smirila ikki vil geva undirskot.

A. Samuelsen: Nei, sikkur eri eg ikki, men gangi útfrá tí.

N. Debess: Eftir hasum havi eg haft lov til at siga tað, sum eg sógði, tá eg var uppi fyrstu ferð.

Uppskot og broytingaruppskot nevndarinnar vórðu samtykt.

Viðtøku um oðuveiðu.

3. viðgerð.

S. P. úr. Konoy (orðførari) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá, at mæla justitsministeriinum til, at núgaldandi viðtøka fyri oðuveiðu í einum parti av Sundalaginum má endurnýggjast til at galda í 5 ár frá 1. januar 1920.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Studningur til rontgenapparat.

2. viðgerð.

Formaðurin: Jeg skal bemærke, at Betænkningen først er fremlagt i Gaar. Paa Grund af den fremrykkede Tid vil jeg, hvis Tinget ikke har noget derimod, i visse Maader se bort fra de Frister, som er satte for Fremlæggelsen af Betænkninger.

M. A. Winther (orðførari) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá, at tann bovillingur, sum løgtingið gav í 1915 til keyp av einum rontgenapparati hoklast til árligan studning uppá 300 kr. í 10 ár at lata av amtsrepartitiónsfondini.

N. Debess: Eg vil spyrja orðførarann, um fysikus hevur úttalað seg fyri at eitt slíkt apparat kann installerast á hesum hospitali, sum nú er.

M. A. Winther: Vit sendu soljóðandi svar til fysikus: »I Anledning af en til Lagtinget rettet Henvendelse om Forhøjelse af det af Tinget bevilgede Tilskud til Indkøb af et Rontgenapparat, skal man paa vedkommende Lagtingsudvalgs Vegne anmode Hr. Fysikus om at oplyse, om der i det nuværende Hospital findes nogen brugelig Plads til Indstallering af Apparatet samt om Hr. Fysikus har faaet nogen speciel Uddannelse i Patientbehandling ved Rontgenapparata. Hertil svarar fysikus: »Som Svar paa Lagtingsudvalgets Skrivelse af 9. August skal jeg tillade mig at meddele, at der findes et dertil egnet Rum paa det gamle Hospital, hvori Rontgeninstallationen kan foregaa, samt at jeg under et kvartaarligt Ophold i København har søgt den nødvendige Uddannelse til at anvende en Rontgeninstallation.«

N. Debess: Eg haldi, at tað er undarligt, at tá man dagliga hoyrir, at plássið á tí gamla hospitalinum er lítið og ovugt í allar mátar, at tað tó skal egna seg til eitt slíkt apparat. Útkastið til tað nýggja hospitalið rokuar jú eitt stórri rum til eina rontgeninnstallatión. Heldur enn á hesum gamla hospitalinum, mátti tað verið betri plás í privathúsinum hjá fysikus ella á sanatoriinum.

M. A. Winther: Eg vóni, at síðsti røðarin vil fata, at nevndin ikki kundi fara og tala nakað um hetta, tá fysikus skrivar, at tað kann gerast at installera apparatið á hospitalinum. Tá hitt nýggja hospitalið verður bygt, kann apparatið flytast hagar; men tað kemur væl ikki higar fyrr enn vit fáa tað nýggja hospitalið.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Londiviðurskifti á Vágseiði.

2. viðgerð.

D. J. Thomsen greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá at biðja amtmannin syrgja fyri, at raunsakan verður gjørd um londiviðurskiftini á Vágseiði og at plánur og yvirslag um at bøta uppá tey verða gjørd.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Frágreiðing frá hospitalsnevndini.

1. viðgerð.

H. C. W. Tórgarð segði frá frágreiðingini frá hesi nevnd, sum ífjør var niðursett viðvíkjandi tí nýggja hospitalinum. Hommara starv var mest til at útskriva eina konkurrancu um ein hospitalsbygning. Á einum fundi 5. oktobir samtykti nevndin at útskriva eina konkurrancu og útsetti 3 premiur: Eina fyrstu premin uppá 350 kr., eina aðra premiu uppá 200 kr. og eina triðju premiu uppá 100 kr. Enn meira varð samtykt at biðja arntsingeniørin fyritaka uppmáling og kortlegging av teirri grund í Álakersbøi, ið var ætlað til at byggja á. Tað varð sett ein tíðarfreist til 5. januar fyri inngávu av plannum og tekningum. So varð nevndin biðin um at útseta konkurrencuna, so at eisini kundi takast part í honni utan fyri Føroyar. Tíðarfreistin varð longd við einum mánaði. Tað inkomu 2 uppskot. Tey vóru skoðaðu og dømd um av dømmunevndini, ið var fysikus Heerup, distriktslækni Zachariasen í Norðuroyggjum, keypmaður V. Lützen og timburmeistari Magnus Jacobsen, ið var valdur av Havnar býráði. Ein maður úr dømmunevndini var ikki í Føroyum, nemliga landstingsmaður J. Patursson. Tað var av nevndini samtykt at geva antin øðrum uppskotinum fyrstu og triðju premiu og hinum aðru premiu, alla øðrum fyrstu premiu og hinum triðju, og varð hetta av millumtinganevndini avgjort eftir tí fyrsta uppskot. Síðani varð fyrispurt hjá sóknarstýrunum í Streymoynni, Vágum og Sýsturoynni, um tey vildu geva studning til byggingar av hesum sjúkrahúsi. Svar er komið aftur frá øllum; tvey sóknarstýri hava svarað nei: í Bø og í Vestmanna, tríggjar kommunur hava svarað ja við forbehold: Hvalvík, Kvívík og Eiði. Sjóvar sókn hevir játtað ein studning av 2400 kr., meðan hini øll hava lovað 3200 kr. Havnar kommunu er spurd um hon vil geva árligan studning til driftina, og hon hevir einki endiligt svar givið, men er villug at forhandla við løgtingið. Vit framleggja nú hesi uppskot, og vit meina, at táið nú svar fyriliggur frá øllum kommununum, so er, sjálvt um tvær sigi nei, kortini nú grundarlag til steðar fyri, at løgtingið gevur studning. Tað hevir ikki verið arbeitt fyri sakini so skjótt sum nevndin hevir væntað, nemliga við samstundis at søkja statin um studning og grund av fútagarðinum í Álakori. Eisini átti tað at verið umrátt, um hospitalið eigur at vera sjálveigandi institutión sum tað nú verandi, ella statsogn. Hetta arbeiði er ikki gjørt, við tað, at antið hevir meint, at tað ikki kundi gerast fyrr enn alt hetta var liðugt, sum nevndin nú hevir fingið í lag. Fysikus meinar, at man eigur at royna at lata sjúkrahúsið vera sjálveigandi sum nú og so søkja studning til driftina frá løgtinginum og frá statinum. Tað hevði verið beint, um ein tinganevnd fekk givið upp í hendi at kanna eftir, um meira kann gerast við sakina her í Føroyum, samstundis sum hon verður send til sunnheitsstýrið. Menn úr sunnheitsstýrinum hava verið her í Føroyum í summar, og teir hava sæð uppskotið og latið væl at tí, so vit kunnu vænta, at teir vilja taka væl undir hesa sak. Eg skal mæla til, at sakin verður beind til tann nevnd, ið er sett viðvíkjandi epidemilógini.

J. Patursson: Tað er ógviliga lítið, og skal siga. Tað varð ífjør kosin millum tinganevnd til at arbeiða við hesari sak og varð eisini kosin ein nevnd til at doma um, hvørjir uppdráttir av teimum ið máttu innkoma, vóru teir bestu. Í teirri seinnu nevnd vóru sum oddfrarin segði, landslæknin, síðan læknin úr Norðuroyggjum, býstýrið hevði valt ein og Føroya løgting valdi meg. Tað er rímiligt, at táið Føroya løgting velur ein mann og løgtingið tekur so miklan lut í byggingini, skuldi ein tríð, at tann maður mátti havt nakað at siga í nevndini. Eg mátti fara burtur til Keypmannahavnar í landsins ørindum, tí bað eg um at fáa tíðarfreistina fyri inngávu av uppdráttum longda, og tá var nevndin so hampilig at játta. Men tá hondla seinna tíðin var útliðin var eg eru burtur---staddur í Keypmannahavn. Tá helt nevndin fund og segði ikki løgtingsins manni frá tá hon

fór at samráðast um uppdráttirnar, og sagði honum heldur ikki frá aftaná. Eg haldi, at her er ikki víst løgtingsins menni nógmikið hensyn. Um tað ikki bar til at kalla meg til fundar, so veit eg ikki, hví ikki nevndin kundi sonda mær sítt álit, og so kundi ug hava givið mína viðtakning. Nevndin hevir hildið meg heilt utanfyri, og eg vil her átala hetta forhold og biðja tingið ansa eina aðra ferð táið slík nevnd verður sett at tað verða lagdar slíkar treytir á, at hetta ikki gerst uppaftur.

H. C. W. Tórgarð: Tann nevnd, sum hr. Patursson umtalar, er ein nevnd, ið hevir arbeitt heilt sjálvstøndiga; og skal bert siga, at frá okkara síðu, í millumtinganevndini, fekk hr. Patursson eitt program fyri útbjóðingina. Annars skal eg siga, at av teim monnum, ið vóru í domunevndini hoyði tingið valt 4, nevniliga fysikus, kommunulæknan í Havn, ið seinni varð umbýttur við distriktslæknan í Norðuroyggjum, konsul Lützen og hr. Patursson. So hr. Patursson var ikki einsamallur tingsins representantur.

J. Patursson: Tað er møguligt, at eg havi tikið nakað feil, og so skal eg eisini viðganga tað. Men tað má takast sum sjálvfylgiligt, at landslæknin og ein vanligur lækni hava verið í nevndini; konsul Lützen hevir vøl mest verið representantur fyri Havnina, so tað eg fanst at, var mest tað, at tair hava hildið tann mann utan fyri, ið var løgtingsmaður, og tí mest má kunna sigast at representera løgtingið. At millumtinganevndini havi eg einki at finnast.

H. C. W. Tórgarð: Eftir løgtingssamtykt ífjor kundu allir hesir vera valdir utanfyri løgtingið.

Sakin varð beind í nevndina viðvíkjandi epidemilógini.

Fundur miðvikuday 10. september.

Formaðurin: Da de 6 Uger, som Samlingen skuldo vare, er forløbne, vil jeg foreslaa, at Tinget fortsattes. Hvis ingen har noget at bemærke dertimod, betragtes det som vedtaget.

Frásagnir sýslumanna.

2. viðgerð.

— —

Ordføreren (Winther) greiddi frá nevndarálitinum. Viðvíkjandi Norðoya og Eysturoyar sýslu var einki útsetilsi gjørt. Viðvíkjandi Vága sýslu hoyði nevndin sett fram soljóðandi uppskot: »Forstanderskabet for Bo Sogns Kommune opfordres til snarest muligt at anlægge den Korebro over Dalsá i Gaasedal, hvortil Tinget i 1915 gav Bevilling«.

J. Rasmussen: Eg vil spyrja um forstandarskapið hevur pátikið sær viðlíkhaldsplikt. Haruppá hvílar tað — teir vilja nokk einki gera fyrr.

M. A. Winther: Hvr er nokk nakað klutar við Bo og Gásadali. Men vit mugu kunna tvinga teir til at uppføra hosa brúnna í honhold til kommunallógina. Tað kunnu teir ikki sloppa frá.

Uppskotið varð samtykt.

Ordføreren: Sandoyar sýslu er einki útsetilsi gjørt til, men harímóti eru tvær atfinningar í Suðroy: til leindistøðirnar í Pollinum, Sumba, og á Skálanoli (Molinum) í Hvalba. Eg vil mæla til at samtykkja nevndaruppskotini.

O. Effersøe: Lagtinget har Tilsyn med Landingssteder blandt andet. Forholdene er ganske vist blevet ret ekstraordinære, idet Cement, hvoraf der jo bruges meget, er blevet overmaade kostbart. Lagtinget kan dog ikke helt give Slip paa sin Myndighed, vi maa holde Øje med, hvorledes Sagerne gaar. Maaske der kunde være Anledning til at lade en med den Slags Arbejder sagkyndig Person undersøge disse Forhold, for at se, hvad der kan gøres. Jeg er ikke i Stand til at skønne om, hvorvidt den stedfundne Underminering kan gøre væsentlig Skade, men der er i Kvalbø flere Personer, som har Forstand paa den Slags, deriblandt Kalmuearbejdere. Jeg mener, at Amtet bør søge oplyst, om der uden store Bekostninger kan foretages noget for at sikre Landingsstedet mod Skade af større Omfang.

Uppskotið varð samtykt.

Leudistoð í Nes—Hvalba.

2. viðgerð.

Orðforarin (Winther) greiddi frá nevndarálitinum.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Leudistoð í Eiðisvík.

2. viðgerð.

Orðforarin (Winther) greiddi frá nevndarálitinum. Eg vil spyrja amtmannin, um tað ikki til amtið er innkomið eitt henvendilsi frá forstandarskapinum ella tað ikki hevur eftirsent eina erklering. Her fyriliggur einki við sakini. Eg forstandi, at hetta verður ein nógso betýðilig sak, sum krevur betýðiligar pengasummur og at vit koma til at søkja studning frá statinum. Skal tað gerast nakað har, so má tað vera nakað munagott og ikki nakað smálapparí. Tað batar ikki at kosta nakrar pengar til hetta, tá tað ikki skal vera so mikið, at tað fæst ordentlig bót uppá plássið. Tað sum útbetringin gongur út uppá, eru stórar hurtapreingingar, gangapøl og fastahunnar. Nevndin fyrisær, at sakin utsetist til næsta ár, og at amtmaðurin heintar erklering frá forstandarskapinum viðvíkjandi hesum máli og fær tingsins álitismann, kanska amtsingeniørin, til at granska viðurskiftini og gova frágreiðing og yvirslag til næstu tingsamkomu.

Formaðurin: Der er ikke til Amtet kommet noget Andragende fra Forstanderskabet angaaende dette Landingssted.

J. M. Matras: Eg havi verið við at skriva hetta uppskotið. Tá vit hava sagt, at tað skal vera tingsins álitismaður ella amtsingeniørurin saman við honum, so er tað tí, at vit halda, at sakin er so stór, at hon kanska verður til eina statsfyritoku og tá komur í eitt betri lag, enn um tingið gevur nakrar pongar. Tá vit nú lata sakina bíða, so hevur mann góða tíð at hugsa seg um til næsta ár. Eg skal gera uppmerksom uppá, at ingeniørurin kemur norður sum tað eisini er ein annur sak, sum hann kann hyggja eftir, neminliga vegnum, sum vit nú gera har, og sum vit hava arbeitt eitt sindur uppá í vetur. Eg vil mæla tinginum til at samtykja nevndaruppskotið.

R. Rasmussen: Eg vil biðja formannin, sum skal ekspedera tingsins sakir, at ekspedera hesa sak so skjótt sum gjorligt til forstandarskapið á Viðareiði, so at teir kunnu byrja arbeiðið næsta summar.

J. M. Matras: Eg kann slutta meg til R. Rasmusson. Kommunan har norðri hevur hjálpt nakað upp á lendingina fyri sína ognu rokning og eisini í aðrar máðar. Um tey skor, sum liggja har, kundu fingist burtur næsta summar, so vildi tað hjálpt eitt sindur.

M. A. Winther: R. Rasmusson meinti, at um amtmaðurin ekspederaði hetta skjótt til forstandarskapið á Viðareiði, so kundi arbeiðið byrjast næsta summar. Tað vil eg ráða frá. Tingið skal altso ikki siggja sakina. Tað ber ikki til. Eg vóni ikki, at amtmaðurin vil geva teimum á Viðareiði hendа tanka.

R. Rasmussen: Eg fasthaldi mín bemerkning viðvíkjandi uppfordringini til amtið.

A. Samuelsen: Eg skal biðja tingmannin á Viðareiði, at hann fráreður Viðoyingum at gera nakað fyrr enn tingið hevur tikið stoðu.

M. A Winther: Eg siggi sakina frá ti síðu, at hon kann koma at verða so betýðilig, at vit kanska søkja studning frá statskassanum. Tað kann vera, at hetta kemur upp ímóti 20,000 kr. Tað var so, at vit lótu Ritavíkingar gera pábót við teirra lendistoð alt fyri eitt, áðrenn tingið tók stoðu til kostnaðin og plánin, men tað var tí, at tingsins álitismaður helt fram, at her var nakað, sum mátti gerast við tað sama, fyri at ikki klettarin har skuldi loypa niður og gera skaða. Men soleiðis er ikki vorðið við hesi sak.

J. M. Matras: Við 1. viðgerð av hesi sak vildi eg skunda undir, og eg tonkti mær, at arbeiðið skuldi gerast við tingsins pongum. Síðani havi eg og fleiri við mær hildið, at vit kunnu fáa statin til hjálpar. Eg vil tí heldur ganga við til, at tað vurdur eitt ordentligt undirsøkilsi.

M. A. Winther: Eg vil biðja Matras biðja forstandarskapið geva yvirlit um, hvat hetta arbeiði kemur at kosta í minsta lagi og hvat tað kemur at kosta, tí tað verður reiðiliga heilskapað. So kann tingið behandla bæði.

N. Debess: Eg vil fegin vita um ting maðurin á Viðareiði framdeilis vil styðja tað uppskot, sum R. Rasmussen kom við at amtmaðurin skal skunda undir, so at nakað kundi verða gjørt longu til summars.

J. M. Matras: Eg haldi, at frá nú og til summars er so long tíð, at mann kann fáa hesar menn at fara til Viðareiðis og geva betonkning, so at arbeiðið kann begynna næsta summar. Eg vil ynskja, at amtmaðurin ekspederar sakina betíðs.

N. Debess: Tað eg spurdi um, var, um Matras vil vera við R. Rasmussen til at arbeiðið longu verður byrjað til næstu tingsetu. Heldur Matras fast við hetta?

M. A. Winther: Eg veit ikki, hví Debess sigir hetta. Hetta fyriliggur ikki. Sakin útsetist til næstu tingsamling. Forholdið millum R. Rasmusson og Matras loysir seg ikki at orðaskiftast um.

N. Debess: Eg loyvi mær at hava mína hugsan fyri meg.

R. Rasmussen: Tað kann kannska framganga av A. Samuelsen, at eg ikki eingang vildi styðja sakina. Men eg útalaði við 1. viðgerð, at hon bleiv ekspederað straks, so hon kundi byrjast áðrenn næstu tingsamling. Eg veit ikki, um vit fáu eykasamkomu. Hon kundi tá tikist upp har.

J. M. Matras: Um R. Rasmussen hevði gjørt broytingaruppskot til nevndaruppskotið og tað hart stóð at um eykasamkoma bleiv, skuldi sakin takast upp har, so hevði tað verið gott.

R. Rasmussen: Tað kundi figgjarnevndin sjálv hava gjort.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Stuðningur til rontgonapparat.

3. viðgerð.

M. A. Winther (ordførari) mælti til, at samtykja nevndaruppskotið.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Broyting í fátækralógini.

2. viðgerð.

Orðførarin (Konoy): Her er komið bræv frá amtinum, ið greiðir frá einum skrivilsi frá justitsministeriinum um at fáa eina broytan í okkara fátækralóg. Í Danmørk er gjøgnumført ein bráfengis lóg í hesum máli, og sipar hon til fylgir av influenzuepidemiini, ið var seinasta ár. Tá vóru mangar kommunur, ið høvdu stórar útreiðslur til hina sokallaðu spønsku sjúku, og har var so gjørd henda bráfengis lóg, ið ásetti, at hjálp, ið fólk høvdu fingið frá kommununi av hesari orsøk, skuldi ikki roknast fyri fátækrahjálp. Nú hevir tann spanska sjúkan eisini vitjað okkum her í Føroyum og var hon reiðuliga ring summastaðni, og amtið hevir so spurt allar kommunur, um tær hava haft útreiðslur av hesi sjúku. Øll søknarstýri hava svarað nei utan í Miðvági og í Ness sókn. Teir hava haft eina útreislu av 125 kr. 77 oyr fyri ein mann, ið hevir ligið á Føroya hospitali, og í Miðvági hevir útreislan verið 128 kr. 62 oyr, altso tilsamans 254 kr. 39 oyr. Amtið upplýsir, at umframt hetta, hevir amtið haft útreislur til laknar og sjúkrapleyurskur úr Koypmannahavn, ið tá komu higar til lands; hetta er goldið úr amtsrepartitiónsfondini og staturin rindar aftur $^1/_3$. Hinar báðar kommunur vilja eisini fáa $^1/_3$ afturrindað av statinum og restina av amtsrepartitiónsfondini. Vit hava tí í nevndini, serliga tá vit hava lingið at vita, at lógin longu er avtikin í Danmørk, ikki hildið, at tað eigir at vera gjørt nakað fyri at fáa eina slíka broytan í okkara fátækralóg, og hava framsett uppskot herum. Eg skal mæla til, at hetta uppskot verður samtykt.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur hósdag 11. september.

Viðurlag til telefonstøðurnar á bygd.

2. viðgerð.

Orðføraria (Winther) greiddi frá nevndarálitinum.

J. M. Matras: Tá tað av orðføraranum var sagt, at hetta revisiónsarbeiði, sum er blivið álagt teimum, sum hava við telefonina at gera, er lætt, so kann eg ikki inurømma tað, tí tað er ikki soleitt. Fyri fólk, sum eru von við kontórarbeiði, kann tað vera, at hetta felur lætt, men tað ger tað sannliga ikki fyri tey ið passa statiónirnar á bygd. Hetta var heldur ikki kravt av fyrstan tíð, hesar treytirnar eru álagdar seinni. Og hetta ger nógv til, at tað verður meir og meira vanskuligt at fáa fólk til statiónirnar fyri rímiligan betalning. Plássini verða uppsøgd fleiri ferðir um árið, tí fólk vil ikki gera hetta nógva, og eftir mínari meining óneyðvenduga arbeiði fyri so lítið. Eg meini ikki, at vit eiga at forplikta tey til hetta.

Orðføraria: Ern krevjingarnar til tær einkultu kommununar um hækking av hesum gottgerilsi stórar og vaksandi, hvar mundu vit so enda, um lóggivið forpliktaði seg til at veita tað. Ivaleyst bleiv tað mangar ferðir verri hjá okkum at imøtikoma hesar krevjingar. Tað er eisini á annan hátt ein vanskulig sok at koma inn uppá. Hvønn skala skulu vit uppstilla fyri betalingini? Skal hetta arbeiða krevja ein heilan dag á eini smástabión úti á bygd, so kann man ikki vænta, at eitt menniskja skal kunna expedera tað fyri allar ynnar, tað vil altso siga, at vit mugu hava eitt størri personali á contralstøðunni í Havn. Eg trúgvi nú ikki, hetta er nitt so farligt arbeiði, sum tey vilja gera tað til úti á bygd.

Joen Poulsen: Jeg kan være enig med Udvalget i, at da vi nu engang er slaaet ind paa den Vej, at Kommunerne holder Stationerne, saa kan vi ikke herfra direkte forhøje denne Godtgørelse, men jeg vilde finde det heldigt, om vi kom tilbage til de 3 Øres Betaling for hver Samtale, thi saa vilde Telefonstationerne i de Kommuner, hvor der er større Arbejde, ogsaa faa større Godtgørelse. Dette Paalæg om at lave Oversigter over, hvor mange Samtaler, fra hvilken Plads o. s. v., har ikke saa helt ringe Betydning for disse Mennesker, det har jeg en Smule Kendskab til. Det er nu engang ikke Kontormennesker, der passer Landstationerne, — dem kan man ikke faa omkring paa Bygderne. Da det var vanskeligt for Stationen at klare det, blev jeg anmodet om at assistere. Det tog mig 6- -7 Timer hver Maaned. Et saadant Arbejde har altsaa noget at sige for de Mennesker, der passer Stationerne og ikke er vant til at føre Regnskaber.

J. H. Poulsen: Eg skal siga, at nevndin hevur fyrisligið undir eini aðrari sak at hækka boðpengarnar nakað, og tá eru bønarbrøvini frá teimum, ið stýra bygdastøðurnar, fyri ein part ímótikomin. Síðani er her skilað til, at arbeiðið við at skriva listarnar skal verða tikið undir yvirvejilsi av driftsútvalginum og driftsbestýraranum. Eg vóni, at stýrarnir av bygdastøðunum, so verða leysir frá hesum arbeiðinum, so mikið meiri, sum listarnir álikavæl mugu reviderast av miðstoðini í Havn. Tað vísir seg, at bygdastøðarnar eru uppsøgdar fleiri staðnis, og eg haldi, at grundin til tað, er tann, at teir, sum stýra teimum, ikki dáma at hava hetta revisiónsarbeiði. Og eg vóni tí nú, at vit fáa eitt annað lag á hesum.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Studningur til pensiónsgrunnin.

2. viðgerð.

....

M. A. Winther (orðførari) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá at játta 2000 kr. av amtsfátøkrakassanum sum studning til eftirlønargrunnin fyri lærarunar og lærarinnur fyri árið 1919 -20.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Løn telefonstjórans.

2. viðgerð.

- -

M. A. Winther (orðførari) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá at geva driftsbestýraranum við telefonverkið hægri løn.

Orðførarin mælti í síni frágreiðing til, at mann í framtíðini tá mangir bæði smáir og storir vegir skuldu gerast her, ikki tók fremmandar verkfrøðingar higar, men læt tílík mál upp í hendurnar á driftsbestýraranum, sum bæði hevði úttdannilsi sum vegverkfrøðingur og eisini hevði góðar royndir frá mongum vegarbeiði, sum hann hevði stílað her á landi.

O. Effersoe: Jeg har som Medlem af Udvalget tiltraadt Betænkningen og dermed Forslaget, men skal udtale, at jeg er betænkelig ved en Del af Forslaget. Vi har maaske lønnet Amtsingeniøren for lavt; han har i hvert Fald hidtil været utilfreds, men nu har vi bndt ham en Løn, som i enhver Henseende maa siges at være tilfredsstillende. Forholdet er det, at han vil faa en Løn af omtrent 10.000 Kr., og om han gaar af om blot nogle faa Aar, vil han faa omtrent Halvdelen i Pension, og skulde han dø, vil hans Enke faa almindelig Embedspension. Men det er det sidste Punkt, jeg ikke synes om. Om Ingeniøren udfører Vejarbejder for Kommunerne, skal han efter Forslaget ikke faa noget Honorar for sit Arbejde, undtagen naar Arbejdet foregaar udenfor Thorshavn, skal han have sine Rejseomkostninger dækkede og 10 kr. daglig i Diæter. Men naar Kommunerne udbyder Arbejdet i Entreprise og der saa kræves Ingeniørens Assistance, da vil det blive Arbejde for private, og for saadant er Ingeniøren efter Forslaget berettiget til at forlange særligt Honorar. Havde det endda været saaledes, at der overhovedet ikke blev nogen Betaling for den Slags Arbejder, og at Amtskommunen holder ikke fik nogen Godtgørelse for Kommunernes Benyttelse af Amtsingeniøren, men dette, synes jeg, lægger en Del af Byrderne over paa private. Jeg er en Del betænkelig ved dette Forhold. Hr. Winther omtalte for det Tilskud, som Island yder til sine Telefonanlæg og nævnte at Telefonen her paa Øerne stod sig betydelig bedre. Jeg skal gøre opmærksom paa, at her er et Forhold, der gør, at Telefondriften maa være mindre bekostelig for os end ellers, nemlig det, at Staten i sin Tid betalte omtrent Halvdelen af Anlægssummen, og vi derfor slipper fri for en stor aarlig Udgift til Forrentning og Amortisation.

M. A. Winther: Eg skal bert siga eini tvey orð til tað seinasta. Hr. Effersoe hevir ikki skilt meg. Eg sagði, at tað var merkiligt, at vit her í Føroyum skuldu hava eitt so ógvuliga lítið yvirskot sum 30.000 kr. av einari fyritøku uppá ½ millión, meðan teir í Íslandi rokna við 400.000 kr. netto í yvirskot. Vit hopa, at vit við at hæðka taxtirnar kunnu koma at arbeiða betur, so vit kunnu fáa lagt fleiri telefonir og eisini kunnu fáa hjálpt bygdalastoðunum við nøkrum av teim kravum, tær framseta og sum eru berættigaði.

O. Effersoe: Saa har jeg misforstaaet Hr. Winther, men mine Udtalelser var for saa vidt rigtige, som at Undersknet vilde være betydelig større, om ikke Staten i sin Tid havde betalt Halvdelen af Anlægget.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Lán til kirkjukassanna.

(Uppskot til samtyktar).

Orðførarin (Winther): Her koma nú um dagirnar skrivilsi um, at tað ikki er nógumikil fríur peningur í kirkjukassunum til at gjalda kostnaðin við bygging av tí nýggju kirkju á Húsum. Tað er komin rokning uppá 16.000 kr. fyri timburtilfar. Í kassunum eru 14.000 kr. í disponiblum peningi, men kassarnar góvu í sínari tíð lán til amtsreparatiónsfondina uppá 20.000 kr. So peningurin er til, men hann er bert ikki nú í staudini til reiðar. Vit hava tí framsett uppskot til samtyktar, ið er undirskrivað av øllum nevndarmonnunum, tó at tveir, teir herrar Effersoe og Samuelsen, hava undirskrivað uttan forbehald. Uppskotið biður tingið geva amtmanninum myndugleika til at frígera lán kirkjukassanna til amtsreparatiónsfondina so nógv ið nýtist til samanan við peningunum í sparikassanum at gjalda hesa rokning, ið komin er. Eg skal mæla til, at uppskotið verður samtykt. Hetta er eingin bevillingssak, so hetta verður vol endalig viðgerð.

J. Samuelsen: Nýslumaður Effersoe og eg hava undirskrivað hetta við forbehald, og grundina til tað skal eg seinni koma til. Vit eru einigir um, at táið amt og prógsti hava páðrigið okkum útreiðslur til hesa kirkju, so má tingið hetala, hvat tað kostar at byggja hana. Viðvíkjandi hvussu peningurin til hesa rokning skal skaffast, kann

tað vera við at gera eina av teim obligatiónum, kassarnir eiga, í peningar. Vit hava skrivað undir við forbehold, ikki tí vit ikki ynskja at betala hatta arbeiði, men tí kirkjuinspektiónin hevir sett hesi arbeiði í gongd í einari dýrari tíð, tá alt mátti verða so nógv dýrari enn tilætlað. Hetta vilja vit hava undirsokt, og samtíðis undirsøkt, um hetta er sett í verk uppá tann bíligasta máta. Vit góvu amti og prósti bemyndugilsi til at byggja kirkjuna, men ikki til at lata hana byggja so nógv dýrari enn tá ætlast kundi.

M. A. Winther: »Av tí at Andrass Sámalsson er komin inn uppá hetta, vil eg ikki hoilt tiga, sjálvt um eg annars skal yvirlata til kirkjuinnspektiónina at klára sín stilling. Eg vil so altfyri eitt slá tað fast, at hvørki Effersøe ella Andrass Sámalsson kunnu fráleggja sær ansvar fyri tað, sum hør er gjørt; er nakað skeivt, so bera teir í fyrsta rokkju ansvarið. Samuelsen veit jú gott, hvussu sakin fyrilá í 1916. Tá var tvritikið nakað so ekceptionelt, at tað eftir míni meining var heilt óforsvarligt. Tingið viðtók neyðiliga at bemyndiga amt og prósti til at orðna alt hesum viðvíkjandi, sum tað sigist í útvalgsforslagnum, sum eg skal loyva mær at lesa upp:

»1. Det nødvendige Beløb til Opførelse af en Kirke i Husum, 12×24 Al. indv. Maal, med Ydervægge af Sten, glatpudsede med Cement, og indvendigt beklædt med Træpanel og med Tagbeklædning af Bolgeblik, bevilges af Norderoernes Præstegælds Kirkekasse og stilles til Kirkeinspektionens Raadighede.

Og punkt 3 ljóðar so:

Amt og Provsti bemyndiges til at ordne det nærmere fornødne.«

Hetta var aldrig fyrisligið fyrr og vit stillaðu tí nakrir nitt ændringsforslag. Men tað vildu Effersøe og Andrass ikki stemma fyri; teir vildu glatt vekk yvirgeva alt bemyndigilsi til kirkjukassainnspektiónina. Nú innrømma teir — eg havi hoyrt tað sjálvir — at teir tá gjordu eitt bummert, men so somir tað seg sanniliga ikki at vilja skjóta ansvarið yvir á teir menn, sum síðani, aftaná at alt var fyriroikað og arbeiðið væl í gongd, hava exponerað teirra viðtøku. At framgangsmátin tá var óforsvarligur, nú bliva teirra skyld, sum samtyktu hann, men teir sum seinri hava fort hetta verk úti lívið, tá tað var begynt, eru sjálvsagt skuldafríðir. Hvat skuldu hesir menn hava gjørt? Skuldu teir havt latið alt ligið og støgga arbeiðinum?

Próstarin: Hetta er vorðin ein sak, sum leggur eina nógso tunga byrðu á kirkjukassarnar og tað er jú spell, at so skal vera. Nú verður hildið fram, at sakin nú undirsokjast, granskast til bótar fyri at fáa at vita, um kirkjukassarnir hava handlað forsvarligt. Eg vil tí loyva mær at siga nokur orð. Og eg vil tá fyrst siga, at hendla sak var avgjørd á tingi, áðrenn teir, sum nú eru í kirkjuinnspektiónini, fingu nakað við hana at gera. Arbeiðið var sett í gongd, áðrenn teir núverandi menn vóru komnir í innspektiónina. Vit hava bara hildið fram við tí arbeiði, sum longu tá var farið undir. Sum tingmonnum kunnugt var tað um veturin í 1915, at hin gamla kirkjan á Húsum tók niður av vindi, og fostandarskapið vendi sær tá til lagtingið við bon um at fáa studning til at byggja eina nýggja kirkju. Kirkjustýrið kasseraði tað gomlu kirkjuna og mælti til at gera eina heilt av nýggjum. Sakin kom fyri her í 1916, at tá var úttalað í nevndarálitinum, at tað var sen Selvfølge, at en ny Kirkebygning snarest muligt maa opføres. Síðani var samtykt at fremja hesa sak. Og hvat var tá viðtikið! At »det nødvendige Beløb bevilges af Norderoernes Præstegælds Kirkekasse og stilles til Kirkeinspektionens Raadighede og at »Amt og Provsti bemyndiges til at ordne det nærmere fornødne«. Her var einki sagt um, hvussu nógvir peningar, ið nýtast skuldu, eingin tíðarfroyst fyri, nær arbeiðið skuldi verða liðugt — tað skuldi bara gerast so skjótt sum møguligt. Tað var í krígsárunum og tað var eisini framhildið her á Tingi, at tað neyvan var ráðiligt at burtleiðera arbeiðið, eftirsum viðurskiftini vóru so óvanlig; eisini av teirri grund, at man meinti, at nakað av tí gamla viðinum kundi nýtast aftur, og tað tí kundi verða nógso ringt at taka arbeiðið í licitatión. Samtíðis var frá nokrum tingmonnum sett fram broytingaruppskot um at stogga við sakini til tess tøkning og yvirslag fyrilógu, men hetta var ikki samtykt. Millum teirra, ið ikki stemmaðu fyri broytingaruppskotinum, vóru teir bádir Andrass Samuelsen og Effersøe. Hvat hevdu vit so at gera? Skuld og greitt at siga: Vit hevdu at gera tað, sum logtingið hevði viðtikið og halda okkum til tað, síðani royna at gera so væl burt úr hesum sum møguligt. Og tað hava vit gjørt. Kirkjan verður bygd á tann máta, sum logtingið hevði fyrisett. Eg hugsi ikki, at nakar kann siga, at vit hava nýtt pengar, sum ikki vóru nevðugir ella at vit ikki hava víst ta sparsemi, sum tørvur

var á. Vit hava bara hildið fram sum byrjað var. Húsamenn hava tingað við okkum um tilfar, arbeiðslon o. s. fr., og vit hava roynt at gera alt á besta, lagaligasta og bíligasta máta. Eg tori siga, at arbeiðslønin har norði hevur verið ein góðan mun bíligari enn aðrastaðni í oynum. Tað er lagt okkum fyri, at vit ikki hava burtlicitera arbeiðið, jú tað hava vit roynt, men vit finnu ongar menn, sum vilhugir vóru at pátaka sær tað. Og løgtingið hevði sum sagt eisini frávátt tað — eisini har hava vit verið í yvireinsstemmilsi við løgtingsins viðtoku. Sjálvsagt er tað spell at henda kirkja er vorðin so dýr, men tað gerst ikki við. Í hvussu er kunnu vit einki gera við tað, — vit hava latið arbeiðið útført sum tingið ynskti tað.

Eftirfáð kunnu vera góð, men tey hava tann feil, at tey koma aftaná. Mundu menn hildið, at vit hevdu kunna forsvara tað, um vit einki hevðu haft gjørt? Húsa sókn hevur frá fyrndar tíð haft kirkju eg veit ikki, um løgtingið hevði kunna forsvara at lata hesi fólk bíða ár eftir ár uppá at fáa sína kirkju aftur. Hvør veit nær tíðirnar blíva oðvísi, nær ið tilfarið blívur bíligari? Tað er ein stórur munur ímillum, at fólk í eini gamlari kirkjubygd kenna saknið størri, tá tey verða fyri utan kirkju, enn har, fólk altíð vóru von at søkja til kirkju í aðrari bygd. Júst í eini slíkari bygd sum á Húsum er saknið ógviliga stórt. Vit hava eisini tey heimýn at taka til teirra, at tey hava grund og ratt til at vænta at fáa kirkjuna gjørda so skjótt sum møguligt.

Skuldin fyri, at hetta arbeiðið er vorðið so dýrt, er tí ikki okkara, men er her ein skuld, so má hon leggjast á teir, sum samtyktu løgtingsins viðtoku í 1916.

A. Samuelsen: Prósturin vil siga, at tann kirkjuinnspoktiónin, sum hann ikki hevði setur í, hevði gjørt sonógv, at tað var ónoguligt fyri tað núverandi kirkjuinnspoktiónina at stansa arbeiðinum. Vit, sum ynskja eitt undirsokilsi sett í gongd, gera tað utan hensýn til ta einni ella aðri innspoktión. Nettupp tað, at Húsamenn, sum prósin sigur, hevdu rætt og grund at vanta kirkjuna uppaftur bygda, gjørdi, at vit viðtóku uppskotið frá útvalginum í 1916 og yvirlótu til amt og prósti at ordna alt, sum noydugt var, men tað betýddi ikki, at vit harvið hava givið amt og prósti tað fornojilsi at lata hetta arbeiðið útføra so og so vakurt utan nakað ansvar fyri, um hesin beslutningur bleiv útfordur uppá eitt ónoguligt tíðspunkt. Eg kann nú ikki teinkja mær, at teir ikki skuldu haft kunnað stelgað, tá tað vísti seg at arbeiðið bleiv so ógviliga dýrt, fyri tað, at har var gjørt nakað gróbarbeiði. Eg vildi funnið tað rímiligt, at teir tá vóru komnir aftur til løgtingið og sagt, at hetta bleiv so dýrt, at teir hildu tað vera óforsvarligt at fortseta. Í tí viðtoku, sum vit gjordu í 1916, stendur, at kirkjan skal byggjast sømarsk muligt. Tað betýðir ikki, at tað skal vera gjørt, um tað vísir seg ónoguligt. Og tað er ein spurningur um kirkjuinnspektiónin hevur ansað eftir at tað er gjørt so spartsommiligt sum noguligt. Tað sigst, at kirkjan hevur fiu spír. Slíkt kostar vel ikki so nógv! Antin tað er núverandi ella fyrrverandi kirkjuinnspektión, sum hevur ansvarið er fyri mær tað sama. Tað er skiligt, at vit hava allir ansvarið til at betala yvirfyri triðja manni, teimum sum arbeiða við handan bygningin og skulu hava pengar afturfyri. Kirkjuinnspektiónin, sum hevur ansvarið yvirfyri tinginum, hevur ikki latið okkum vita av, at hetta er so ógviliga dýrt fyrr enn vit nú fáa at vita, at eingir pengar eru at betala við. Prósturin sigur, at fyrrverandi kirkjuinnspektiónin hevur bundið okkum til hetta arbeiðið. Hvat hevur hon tá gjørt, síðani tað ikki er gjørligt hjá núverandi kirkjuinnspektión at stogga arbeiði. Próstin sigur, at eingin tíðsfroystur var gjørdur og tí vard hildið, at kirkjan skuldi byggjast við tað sama. Nei, tað er einki sagt um, at kirkjan skal byggjast, um tað vísir seg ógjørligt at byggja. Próstin sigur, at einki av tí gomlu kirkjuni kann brúkast. Jú, timbrið kann brúkast. Um tað gamla timbrið ikki var brúkiligt, kundi man burtlicitera viðarbeiðið og viðin. So sigur prósturin, at teir hava roynt at fáa bíligan við. Lat okkum fáa at vita, hvat teir hava gjørt í handan rætning, tá prósturin sigur, at teir ikki hava gjørt annað enn tað sum tingið vil. Tað skal og einki siga imóti. Tann spurningur, sum er reistur av mær er, at vit vilja ikki standa imi fyri tí, sum kirkjuinnspektiónin hevur gjørt í hesi sak fyrr enn vit fáa at vita, hvussu hetta er gjørt. Vit skulu koma til botns í hesi sak.

M. A. Winther: Eg vil spyrja A. Samuelsen, hvussu hann ætlar at fyritaka hetta undirsokilsi. Skal tað vera við eini kommissión ella á annan háttt. Tað má vel verða eitt sakligt undirsokilsi. Ella vil A. Samuelsen fyritaka undirsokilsi einsamallur.

Prósturin: A. Samuelsen sýnist at hava fata mog so, at vit hava tikið okkara uppgávu soleiðis at kirkjan skuldi gerast straks. Kirkjan tók niður í 1915 og vit lóta hana byggja aftur í 1919 Tað er ikki so ógviliga »straks«. Hann meinar, at vit kundu stogga við arbeiðinum, tá tað vísti seg, at tilfarið var so dýrt. Men tá bygningurin standur í gerð ber vist ikki so vel til at stogga. A. Samuelsen meinar, at tað kundi stogga við timbrinum; men vit hava talað við Húsamenn um tað, og teir meintu ikki. Teir meintu, at bygningurin mátti innilukkast og takið fáast á. At stogga og so at fara undir aftur bygningin vildu eisini dýrkað arbeiðið. Stillads skuldi tá takast niður og setast upp aftur o. s. fr. e. Ig veit ikki, hví man heldur at kirkjan kundi fáast til sama prís sum fyrr, tá alt annað er dýrkað. A. Samuelsen heldur, at tað er undarligt, at kirkjan skal kosta 4—5 ferðir so nógv — tá hann veit, at allir aðrir bygningar kosta 4—5 ferðir so nógv. A. Samuelsen hevur sæð fim spír á kirkjuni, og tá er einki at undrast á, um hann heldur okkum vera flottar. Men hevur hann sæð fim spír, so er hetta naknð, sum bert hevur gyldað seg fyri hansara eygum og oyrum. Nógv av tí gamla viðinum er nýtt aftur til at bróta við. Men man veit, at gamalur viður er ódrúgvur at brúka aftur. Eisini er tann gamli viðurin brúktur til stillads. Stórviðurin er av uýggjum. Eg haldi ikki, tað er beint at siga, at amt og prósttið hevur ádrigið okkum hesar útreiðslur. Tað er tingviðtokan av 1916, sum tað hevur gjort.

O. Effersøe: Winther fremhævede, at det var det daværende Flertals Fejl, at det i 1916 vedtog Beslutningen om denne Kirkebygning. Han mente derfor, at Ansvaret burde lægges paa de paagældende Personer. Deraf følger vel, at om man havde fulgt Mindretallet, saa vilde det ikke være blevet godt. Jeg var i sin Tid betænkelig ved at stemme for at overgive til Kirkeinspektionen at lade Kirken bygge uden at der forelaa Overslag og Tegning, da dette er udenfor det sædvanlige. Men Kirken var blevet umulig, og under disse ekstraordinære Forhold gik jeg med til at lade Kirken opføre. Men jeg mente ikke, at der skulde være givet Kirkeinspektionen frit Slag, men at den maatte have Ansvaret. Og naar Bygningen vilde blive saa kostbar, saa maatte man søge Tinget om en Efterbevilling. Eller man maatte standse Arbejdet og saa spørge Tinget om, hvad der nu skulde gøres. Der blev sagt, at det ikke var muligt at standse Arbejdet. Jeg ved ikke, hvorledes Arbejdet paa de forskellige Tidspunkter er blevet fremmet. Naar Murene er blevne færdige, er det maaske ikke saa godt at standse. Men det kunde tænkes, at man paa et eller andet Tidspunkt vilde kunne standse Arbejdet, naar man følte sig tvungen dertil paa Grund af de himmelhøje Priser. Vi kender alt for lidt til denne Sag og den foreligger langt fra oplyst. Jeg kender ikke til Spirene. Men om der er lavet et Spir af den almindelige Slags, saa er det sikkert blevet overordentlig kostbart, da Jærn er i særdeles høj Pris. Man kunde vel i al Fald have ventet med at lave Spiret. Jeg hørte ikke rettere, end at Provsten mente, at Kirkeinspektionen var afskaaret fra at bortliciterе Arbejdet; jeg finder ikke noget i Lagtingstidende, der tyder herpaa. Jeg synes, at der kunde være megen Grund til, naar Forholdene udviklede sig saa ekstraordinært, at man saa sagde i Kirkeinspektionen: nu standser vi Arbejdet, eller ogsaa bortliciterer vi det; og hvis der ikke kommer noget rimeligt Tilbud, bliver den ikke opført nu.

J. H. Poulsen: Sjálvsagt hava vit allir ansvar her og eru bundnir av, hvat tingið eina ferð hevir samtykt, tó kunnu teir ið ikki stemmaðu fyri, væl halda seg hava eitt sindur minni ansvar. Eg stemmaði fyri hesum uppskoti; men og framsetti broytingaruppskot, ið var forkastað av samhandsmonnum saman við tí táverandi kirkjuinspektión, og tað gekk út uppá, at útseta sakina til tað var framskaffað tøkningar og yvirslag. Tað var siður fyrr í tíðini at bjóða kirkjur út í licitatión; men tann regul varð frávikin í prást Petersens tíð, og eftir tí, og veit. var so leingi hann var prástur, eingin kirkja útbodin í licitatión. Mítt broytingaruppskot varð forkastað við tvirri motivering, at hon var ikki tíð at bíða. Eg kann ikki tænkja mær eitt undirsókilsi í hesari sak, uttan av einari parlamentariskari kommissión, eitt undirsókilsi av hr. A. Samuelsen einsamallum vildi óivað verið nakað einsíðugt. At byggja hesa kirkju var samtykt í 1916 fyrst í 1918 kom hendla núverandi kirkjuinspektión, so tað má vera eitt forsómilsi av hini gomlu inspektión, at materialir ikke vóru keypt í teirri bíligu tíðini. Her hevir verið so nógv tos um hetta spír, og so nógv ynist tos. Andrass Samuelsson heldur har vera 5 spír. Effersøe eitt stórt. Effersøe meinti, at spírið kundi vera spart. Tað trúgvi eg ikki; tað kann ikki hon vera

tala um annað enn eitt spír sum tað vanliga er á føroyskum kirkjum, og eg trúgvi ikki, at tað vildi verið bíligara at seta eina floystong upp aftanáa, at tornið var takt við jarni.

A. Samuelsen: Eg haldi tað vera sjálvsagt, at tátil sjálvstýrismenn skulu fara at hugsa um, hvussu eg kann hava tonkt mær eitt sovorðið undirsøkilsi, so fyrisláa teir strax parlamentariska kommissión. Vit hava ikki gjørt tað nakrantíð, fyri tað fyrsta, tí løgtingið ikki hevir rætt til at niðursetа parlamentariskar kommissiónir, og ta einastu ferð vit hava roynt tað í fjor, vildi hr. Zahle einki vita av kommissiónini. Eg haldi ikki vit skulu hava nakra kommissión. Hvor skal formeina mær at fyritaka tað undirsøkilsi einsamallur? Eg ætli mær at fyritaka hetta undirsøkilsi; vit ætla at fyritaka hetta undirsøkilsi, um her er forsvarliga atborið, um materialini eru keypt forsvarliga og annað meira. Eg vil ikki vera við til at seta eina kommissión; Zahle vildi jú ikki fremja tað uppskot um kommissión tingið setti fram ífjor, og eitt uppskot frá mær vildi ikki blivið framt. Tátil fyriliggur uppskot frá ordføraranum um at niðursetа eina kommissión skal og yvirveya mína støðu. Prósturin sigir, at hann var ikki smiður, og tí visti hann ikki, um hann kundi stedga arbeiðinum ella ikki. Eg visti eisini, at prósturin ikki er smiður; men hann kundi spurt onkran smið; ivaleyst kunnir hann onkran smið, um ikki annað onkran krotusmið. Og so vildi hann fingið at vita, at arbeiðið átti at stedgast. Um J. H. Poulsen meinar, at prósturin ikki kom í kirkjuinspektiónina fyr enn í 1918 er tað ravnuskandi skeivt. Hann varð konstituerandur sum próstur í 1917 tátil prost Evensen varð sjúkur, tað kann ikki komast utan um. Eg viðkonni mær ikki útbalilsi um, at kirkjan skal vera 4—5 ferðir so dýr sum ætlað, men vit vilja fyritaka eitt undirsøkilsi, um ikki arbeiðið hevir verið ov dýrt. Um tað skal vísa seg, at tað er rætt, at tað er bygt spír á kirkjuna eftir tí, sum vit meina við spír í Føroyum, so vil tað bert vísa, at prósturin ikki hevir haft nógv skil á, hvat her hevir gingið fyri seg. Vit vilja allir luta pening til hesa kirkju, sumir við gleði, vit aðrir tí vit eru noyddir.

Prósturin: Nógv tos kemur niður á hesi spír, ið A. Samuelsen vil hava at vera nógv í tali, meðan Effersøe meinar, at har er bygt eitt stórt spír; og veit eingi annað enn at tað er eitt vanligt spír. Effersøe segði, at hann fataði meg soleiðis áðani, at vit hildu, at løgtingssamtyktin frá 1916 bant okkum. Tað er ikki serliga tað, men tað at tað hevir verið ómugidligt at fáa nakran til at taka licitatiónina í hesi tíðini. Enn meira hevir tað ikki verið siður í mong ár at burtlicitera bygging av kirkjum, vit hava her hildið uppá gamlan sið. Tað kann eisini sigast at vera nakað beint í tí, ikki at burtlicitera bygging av kirkjum, ið gjarna skuldi verið bygdar so solidt sum muguligt. Hr. Samuelsen roynti at huroellera yvir, at eg ikki var so vitugur at eg hevði skil á hesum arbeiði; eg skal bert siga aftur, at eg havi ráðført meg við smiðir norður á Húsum.

O. Effersøe: Jeg kan ikke indrømme, at jeg har talt om et stort Spir i Modsætning til Hr. Samuelsens 5 Spir; jeg sagde kun, at det var fortalt mig, at der var opført Spir, der var meget dyrt. Dette er ikke Spørgsmaalet, hvorom det drejer sig, men om, hvorvidt Kirkeinspektionen under alle Omstændigheder maatte gennemføre Bygningen af Kirken paa Trods af de dyre Priser paa alle Materialier.

H. C. W. Tórgarð: Eg skal bert gera eina lítlan bemerkning til próstin. Hann lat forstanda, at tað kundi vera eitt ringur skilkur at burtlicitera, serliga við eina kirkju, ið skal standa leingi. Eg má siga, at tað er tann almindiliga meining ikki minst millum handverkara, at byggingin verður ikki ringari við licitatión. Tað er ikki beint, at kirkjur ikki eru útliciteraðar í teirri seinni tíðini. Tann seinasta kirkja, ið varð bygd í Føroyum, kirkjan í Sandavági, varð útliciterað. Kirkjan, ið var ætlað at byggja suðuri í Vági, var útbodin í licitatión eisini í Noregi; kirkjan á Tvøroyri var útliciterað bæði her og í Danmark.

A. Samuelsen: Eg spurdi próstin. um hann kundi upplýsa, at tað var gjørt so nógv við kirkjuna á Húsum, tá hann bleiv prástur, at arbeiðið ikki kundi stedgast. Eg vildi eisini vita, hvat ið var gjørt við kirkjuna á ólavsoku ífjor. Um tað ikki var gjørt nakað við hetta áðrenn prósturin var konstitueraður, má hann deila ansvarið fyri hvat, ið seinni er gjørt við, tann távarandi umboðsmann, men vísir tað seg, at einki boldur var gjørt á ólavsoku ífjor, kann einki ansvar leggjast á tann távarandi umboðsmann, men alt fellur á ta núverandi kirkjuinspektión. Tá próstin argumenterar

við, at táið hann kom til, var so nógv gjort, at tá kundi ikki staðast, so má hann eisini vera pliktugur til at upplýsa, hvat tá var gjørt.

Prósturin: Til tað, Andr. Samuelsen nú har fram, má eg siga, at hatta havi eg ongatíð sagt. Viðvíkjandi liniatión vil eg bara siga til Tórgarð, at núni orð ikki vóru at arbeiðið bleiv ringari tá, uon at vit við slíkar bygningar hevdu onnur hensýn at taka enn bara tey at fáa arbeiðið gjørt so bíligt sum møguligt.

S. P. úr Konoy: Eg eri ein av teimum, sum hava sitið í kirkjukussaútvalgi í mong ár og var við tað ár, tá hetta uppskotið varð samtykt. Tað undrar mog í nakran máta, at samhandspartíið hevur tikið hesa støðu tit honda spurning. Vit vóru allir á fyrsta sinni klárir yvir at hotta bleiv dýrt og tað var prást Petersen við; haun segði: Er tað okkara ætlan at lata Húsar fáa kirkju aftur, so mugu vit vága nakað. Vit fingu boð frá Húsamonnum nu, at teir skuldu skaffa tekning og prást Petorson ynskti tessvegna at kirkjan skuldi verða uppført í sama stíli, sum tær gomlu kirkjurnar, vit hava. Tað er víst eisini gjort. Árið eftir var Andras Ivenson prástur, holdur ikki tá var talað uu at støgga arbeiðið. Eg veit ikki, hvat kirkjuinnspektiónin hevur gjort, men teir mugu í hvussu er hava fingið tað bestemta inntrykk av logtinginum, at sakin skuldi fortsetast. Eg trúgvi ikki, at prást Petersen, um haun nú sat í inspektiónini, vildi verið til at útsett salcina; tað er nítt uppfatilsi av honum frá tí tíð, vit vóru saman í kirkjukussanevndini. Eg vil ikki gora oppositión uppá hetta spursmál.

A. Samuelsen: Eg havi ikki lug at diskutera, hvussu tað hevði verið, um prást Petersen sat í kirkjuinspektiónini nú; haun hevur verið deyður í mong ár.

Hensýnið til Húsamenn, at teir skuldu fáa teirra kirkju sum skjótast var orsakin til, at vit allir stemmaðu fyri tí extraordinora forslagnum frá útvalginum í 1916. Viss kirkjan ikki var farin, hevði forslagið ikki verið viðtikið í tí formi. Mon síðani eru allir prísir farnir ógviliga hogt upp, og eg kundi tí lugsa mer at inspektiónin, sjálvtum hon var nokkso nógv benyndigað frá logtinginum, var komin til tað resultat, at gull kann vera for dýrt, at kirkjan ikki kundi byggjast undir hesum forholdum. Eg haldi, at tað hevði verið tilstrekkelig grund hjá inspektiónini til at spekulera yvir, um tað ikki var rættast at venda sær aftur til logtingið og spyrja, um teir skuldu fortseta ella støgga. Tað er ríniligt, at inspektiónin hevur roynt at gera alt so bíligt sum møgudigt; vit vilja nú hava undirsokt, um tað er tilfeldi. Eg unni Húsamonnum eina prýðiliga kirkju, men er har bekostað nakað extraordinert við pynti o. t., so skuldi inspektiónin haft spurt um tað fyrst. Tað fyrikemur mær, at teir ikki hava spurt hjá allum teim monnum, sum vanir eru at útføra slík arbeiðir og handla við slíkum materialum. Í so fall hava teir ikki útvíst tað størst møguligu sparsomniligheit.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Umsóknir frá Føroya skipara- og navigatorfelag.

2. viðgerð.

R. Rasmussen (orðførari) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerðar.

Joen Rasmussen: Sum ordstýrarin hevur greitt frá hava vit í nevndini verið samsintir í 1. og 2. parti av uppskotinum, men viðvíkjandi 3. partinum hava vit skilt okkum í ein minni og ein meirihut. A. Samuelsen og eg hava tó ikki haft grund til at framsetа serligt uppskot, tí vit halda, at tað vil virka hemmandi á motorbátafiskiskapin. Motorbátafiskiskapurin verður í vissar mátar drivin eins sum fiskiskapurin við árabátum; man velur teir dygtugastu menn til teir, og tann kann ikki forlanga, at teir eldru av slíkum monnum skulu fara og læra tað, sum her verður fyriskotið. Tað eru eingi krov komin um hetta frá motorbátaeigarum og tað er ikki nokk at bara navigatorfeleingin vil hava tað so. Vit meina ikki, at tað kann sigast, at tað er serlig vanskiligheit tilstaðar fyri monniskjalív og verdíir, um tað ikki verður so sum navigatorfeleingin vil. Minnitalið vil eisini fyrisláa, men vit meina at halda okkum til tað, sum er viðtikið í tinginum 1916.

Edv. Mortensen: Eg havi kunnað samtykt tey tvey fyrstu punktini, og í triðja punktinum eisini tað mesta, sum er fort fram av R. Rasmussen og Debess viðvíkjandi, at motorbátar fáa forarar, sum eru kendir við tær informatiónnu reglur um

stýring, men tað er nakað nógv at leggja á, at tað í hvørjum báti skal vera maður, sum hevur tikið examen í hesum. Eg vil gangga við til, at hetta verður fritt fyri menn at taka eina sovorðna examen. Vit hava fyrr haft motorpassarprova her, sum hevur verið fríviljugur, og nógvir tóku tann prøvan. Og sanna vildi tað vist verið, um tað varð frivilligur prøvu í sjóreglum fyri motorbátaførarar. Eg havi tí ikki sluttað meg til uppskotið um, at tað skal vera ein plikt fyri teir at taka slíka examen.

J. Guttesen: Viðvíkjandi tí, sum fyriliggur nú, vil og nærmast slutta meg til Mortensen. Eg haldi tað vera ov mikið avgjørt at innføra hetta við lóg. Ein hátur fra 10 upp til 20 tons kundi hava gott av at hava ein mann umborð, sum kendi sjóreglurnar. Men fyri teir sum føra motorbátar undir 10 tons, haldi eg tað vera ovnógv, at teir við lóg skulu undirkasta seg at læra sjóreglurnar. Viðvíkjandi § 2 stendur at maður, sum hevur ført motorbát í 2 ár, skal sleppa frá hesum. Nú er tað so ójavnt sum motorbátarnir oru úti. Ein bátur kann vera úti 10 dagar um árið, ein annar 50—100 dagar. Um tað skal roknast eftir áratali koma summir at hava eitt nógv minni útdømilsi enn aðrir.

N. Debess: Eg havi verið í nevndini og vil ikki koma inn uppá motivering fyri mína støðu, tí tað er framført í nevndarálitinum. Eg haldi, at tá Mortensen vil viðgangga tað beldiga í at teir menn, sum skulu føra motorbátar, hava ein serligan kunnleika, so er hann komin nakað ner til okkara. Og tá hann tekur tey lempilsir, sum vit hava framført, so mátti hann kunna koma í okkara part. Hetta kann ikki koma at gangga út yvir nakran, sum nú førir motorbát. Spurningurin er ikki so vanskiligur, sum man trýr. Teir allarflestu motorbátar hava førarar, sum longu hava uppfylt hesi forpliktilsir. Eg haldi tí, at Guttesen og Mortensen kunnu fylgja okkum. Eg vil biðja teir at hugsa um til 3. viðgerð, um teir ikki kunnu fylgja okkum.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur fríggjadag 12. september.

Hækkan av samtalugjaldinum.

3. viðgerð.

M. J. Winther: Telefonnevndin hevir í ár millum annað uppskot eitt frammi um at hækka gjaldið fyri telefonnýtslu. Orsakin til tess er ymisleg, vit vilja fáa størri útreiðslur í framtíðini til telefonina; vit skulu hækka lønina hjá telefonstýrinum, vit skulu leggja telefon til pláss, ið ikki hava haft hana fyrr, og vit koma til at vera noydd at dubblera summar linjur, ið eru nógv nýttar. Um vit skulu kunna gera alt hetta, megna vit ansa, at vit hava pening at taka av, og at vit ikki koma telefonini á húsagang. Tí mega tey, ið nú kunna nýta telefonina og hava gagn av henni, gjalda so mikið, at eisini teir Føroyingar ið ikki hava telefon enn, við tíðini kunna fáa hana. Allar útreiðslur til nýanleggg eru nú so mangar ferðir dýrari enn fyrr. Táið vit á sinni logdu kaðalin um Suðuroyafjørð, yvir tað langa strekki frá Skarvanesi til Sandvíkar kostaði hann kaðalin ikki meira enn 60—70,000 kr., meðan vit nú vilja leggja ein kaðal yvir eitt so stutt strekki sum úr Gásadali til Mikjunesar, vil hann kosta o. u. 100,000 kr. Útreiðslurnar av hesum anleggi vilja standa í eitt undarligt forhold til tær inntokur ið kunnu vøntast, samanlíknað við kaðalin til Suðuroyar, og yvirlsvur vil forrentaring og avdrag av hesum nýggju anleggum verða nógva ferðir tyngri enn av teim gomlu. Fesini av aðrari grund noga vit royna at fáa størri inntokur: vit hava nógvar linjur, hvar stoytur eftir steyri er farin av roti; soleiðis er í Sandoynni, Vágum, Ileiri stoðir í Suðuroy, at stoytarnir skjótt mega býtast um við nýggjar yvir mangar kilometrar. Um vit fáa víðari telefonsamband vil tað ikki okja um inntokurnar í sama forhold sum útreiðslurnar við anleggið, tí trafikkurin eftir hesum linjum fer ikki at geva nitt yvirskot, ið vil svara til forrentaring og avdrag av anleggskostnaðinum. Tíðirnar oru soleiðis nú, at man kann gjalda meir fyri nýtslu av telefonini enn fyrr, peningarnir eru fleiri manna millum og hava minni virði. Tað var upplagt okkum, táið vit hinaferð hækkaði um gjaldið við 5 oyr. fyri hvørja samtalu, at nú fór nýtslan av telefonini at minka; og tráði ongantíð uppá tað, og tað vísti sog eisini, at samtalurnar okkust mánað undan mánaði, ár undan ári, og soleiðis verður eisini við hesara

hækkan. Tey ið vilja nýta telefonina spyrja ikki nú eftir hvat tað kostar, men hvussu skjótt tey kunnu koma til, og tað almennuliga er at krevja ilsamtalur, ið kosta nógv meir, enn almennar samtalur eftir hækkingini. Vit kunnu ikki fara at leggja telefon til útoyggjanna uttan at vit framumanundan royna at útvega okkum nakra inntøku at byggja anleggini fyri. Nú er tað soleiðis, at tað er stutt síðani, at ministoriið fastsetti nógaldandi gjald sum goldandi til 1921, men tað man eitki vera í vegin fyri, at ministoriið kortini nú vil staðfesta hetta nýggja gjald. Ég skal leyva mær at lesa uppskotið upp. (Upplestur). Skal og mæla til, at uppskotið verður samtykt.

Poul Nielasen: Ég havi verið limur av teirri nevnd, ið hevir havt hetta til viðgerðar og havi undirskrivað uppskotið utan forbehald. Tað kann tykjast tingmonnum, at hendu hækkan uppá 50 pct. er eitt nóg so stórt lop, men vit megna mitmast til, at allar útreistur hesum viðvíkjandi eru nógv størri enn fyrr, og telefonin kemur í framtíðini at koska okkum uppaftur meira. Serliga fyri Havnina vil hendu hækkan vera følilig. Her í Havn eru o. u. 100 abonnentar. Verður abonnementið hækkað frá 60 til 80 kr., koma Havnar abonnentarnir at hata einar 2000 kr. til telefonina aleina uppá tað konto. Tað er ikki so lítið. Hvat viðvíkur tí at leggja telefon til útoyarnar, er tað unguligvís rett sum orðførarin segði, at tað ikki so væl letur seg gera í eygablikkinum, eftir sum líkindini f. t. ikki eru so góð, men eg haldi, at tað hevði verið formuttigt av tinginum at undirsukt ein annan loysning, sum eg havi haft frammi her fyrr, nemliga tráðleysa telefon. Ég tosaði beint áðrenn eg kom her inn við ein mann, sum líka var komin frá Englandi, og sum segði mær, at teir í begynuinginum av hesum mánaðinum hevdu ein stóran uppvísning yvir tráðleysa telefonering. Har hoyrdu teir tosa við eina flúgvumaskinu, sum var 8000 fót yvir London, og teir hoyrdu aldeilis týðiligt, hvat ið telefonerað var. Teir hoyrdu eisini latið eina fonograf spæla og við hjálp av tí tráðloysa hoyrdu teir harmoni í flugvumaskinuni aldeilis týðiligt musikkin. Ég haldi tí tað kann vera ótl góð grund til at millumtinganevndin, sum her umtakiligt verður niðursett, gjalla kannar eftir um vit í eini nærari framtíð kunnu koma í tráðleyst samband við útoyarnar. Tað er sjálvsagt ógviliga kodiligt fyri tær, at vit ikki enn kunnu hava lagt kájpul til teirra; tað er møguligt sum sagt var nakað torført at leggja kaðal til Mikjunesar, tó mín æraði síðumaður pástoudur, at viðurskiftini í Mikjunesfjørði ikki í nakran máta eru verri enn í Skopunarfirði.

Orðføraríu: Tað er gamman í tí, sum Poul Nielasen sigur um tráðleysa telefon, men hetta er ein sak um hækkan av taxtinum, ikki um útviðilsi av telefonnetinum. Tað koma vit til seinni.

Jacn Poulsen: Nu, da alt er steget saa højt i Pris, er det gansko naturligt at vi ogsaa bliver nødt til at forhøje Taksterne. Det var blot et Par Punkter i Udvalgsbetænkningen, jeg kom til at tænke paa. Det var først med Hensyn til Abonnementsprisen, hvor jeg tror, der er faldet lidt ud. Hidtil har der været en Pris indenfor 1 Kilometer og ogsaa en udenfor 1 Kilometer, men det staar der intet om i Betænkningen. Jeg vil blot henlede Udvalgets Opmærksomhed herpaa. Saa er der Budsendingen. Her er der foreslaaet en Takst indenfor en halv Kilometer og en indenfor 1 Kilometer. Jeg vil gerne ønske, at vi fik en tredje for 1—1½ Kilometer. Det er jo nemlig saadanles i enkelte Bygder, at Gaardene eller Husene ligger spredte, nogle lige udenfor 1 Kilometer eller deromkring. Det vilde da se underligt ud, om Budsendinger til disse Beboere skulde betales med 20 Øre plus Skydstakst; de vilde i saa Fald blive uforholdsmæssig dyre. Jeg vil derfor henstille til Udvalget, at der ansættes en tredje Takst med f. Eks. 30 Øre for 1 Kilometer indtil 1½.

Orðføraríu: Tað er nógv í tí, sum tingmaðurin á Strondum her sigur; vit hava eitt gott dømi heima á Sandi í so máta nevnliga Tradir. Tað er óivað best at seta eitt tríðja mark: innanfyri 1½ kilometer.

J. M. Matras: Táið hev stendur, at man skal hækka abonnementtið fyri persónar úti á bygd frá 40 til 60 kr., so er tað kannaka nakað hvørt yvirhoyur; tað átti at verið forskel uppá, hvar nógvir og fáir abonnentar eru. Táið byggiabonnementtið er sett til 60 kr. og Havnin til 80 kr., so má tað sigast, at Havnarmonn eru sloppnir lætt, heldur ovvæl. Tað er jú enn eingi skil komið á tað, at Havnin ikki gevur forholdsvís sonógv til sína telefonstoðu, sum bygdirnar til teirra; á sonn tíð hava Havnaabonnementarnir stórar fordeilir av telefonini, teir spara so ógviliga tíð við at telefonera sínámillum. Punkt C., har abon-

nomontið utan frían samtalurætt er fyrisligið hækka frá 30 til 50 kr., haldi og vera eitt altfor stórt lop. So er hækkan av bóðpengunum. Her hevur markið altíð verið: innanfyri 1 kilometra 10 oyr., lat tað hækkast til 15—20 oyr., men eg havi ongan húg at býta henda fyrsta kilometran í helft. Tað kann vera ógviliga keðiligt ofta og títt. Eg vil slútta meg til tað, Jógvan Poulsen segði, at vit áttu at taka ½ kilometra aftrat áðrenn skytstaxturin verður benyttaður til boðsending. Eg kann eisini ganga við til at hækka samtalutaxtirnar undir tí forútsetningi, at telefonnetið verður útvíðað so skjótt sum tilber. Tað vóru eini gleðilig tíðindi, sum síðumaður núv Poul Nielsen bar fram, og eg vil hopa, at tann komandi milluntinganevndin vil undirsokja hetta spursmál.

Ordføraríu: Eg kann geva tí seinasta talara rætt í tí, at abonnementið utanfyri Havn utan frían samtalurætt kannska átti at verið lægri enn vit hava fyrisligið. Harímóti dugi eg ikki at siggja hvussu ein ordningur skuldi verið, sum gjordi mun á teimum plássum har nógvir abonnentar eru og har teir eru færri. Vit máttu íso fall havt nógv forskotlig stig, men tað fer ikki at bera til. Men tá ikki frían samtalurættur er, er hetta óivað ovnógv at hæðka abonnementið frá 30 til 50 kr. Eg vil biðja tingmannin úr Norðoyggjum stilla eitt endringsforslag um hetta.

O. Effersøe: Jeg kan slutte mig til Udtalelserne fra P. Nielsen med Hensyn til Spørgsmaalet om traadløs Telefon. Dette Spørgsmaal er meget betydningsfuldt. Det vil blive en meget kostbar Sag for os at sætte Udøerne i Forbindelse med Telefonnettet ved Kabler. Man har for flere Aar siden beskæftiget sig med disse Spørgsmaal. Og der har ogsaa været Forslag fra Valdemar Poulsen om at etablere traadløs Forbindelse mellem Suderø og Thorshavn. Da dette ikke er blevet til noget, er det fordi man frygtede for, at Anlægget ikke vilde blive tilstrækkelig driftsikkert. Jeg har hørt, at man har benyttet traadløs Telegraf mellem Norge og Amerika, og der er ingen Tvivl om, at man paa mange tekniske Omraader er naaet meget langt under Krigen. Jeg vil anbefale Telefonvæsenets Driftsudvalg, at det søger at skaffe Oplysning om den traadløse Telefons Udvikling og Mulighed for at anvende den her.

J. M. Matras: Eg halði ikki, at tað er stórvegis arbeiði við at rokna út, hvussu mangir abonnentir eru í hvørji bygd og at seta ein skala hvar eftir og siga at fyri upp til 5 abonnontar í eini bygd skal tað kosta so nógv, og fyri 10 so nógv o. s. fr. e. Hetta kundi so til einahvorja tíð hæðkast um tað var noyðugt.

M. Samuelsen: Eg havi ífjor gingið við til at hæðka takstirnar, men tá eg gekk við til tað, var tað undir tí forútsetingi, at telefonin skuldi vera brúkt so, at hon kom ollum til góðar. Men eg skal her rora við eina aðra sak: Um útvíðkan av telefoninum. Her ur fyrisligið Tórshavn-Fuglafirði og Vestmanna-Fuglafirði. Eg vil krevja, at Vestmanna-Fuglafirði kemur í fyrstu rokkju. Ífjor var andragandi frá Langasandi um at fáa telefon; men driftsstýrið sló tað niður, tí einki kundi gerast norðanfyri fyrr enn heimlan linjan var dublerað. Viðvíkjandi hækking av gjaldinum fyri abonnentar, má eg halda við Matras. Tað eru tveir abonnentar komnir inn aftrat í Haldórsvík, men teir vildu neppa komið inn, um teir vistu um hvussu nú er mðan at hækka abonnentsgjaldið. Grundin til, at teir komu inn, var, at tað ikki var til at sleppa frammat telefonini, og teir kundu ikki stongja sín forrætning fyri at sita allan dagin á telefonstoðuni og bíða fyri at sloppa framat.

Vit vilja bara ikki forhandla um okkara dýrastu interessur, vit vilja ikki forhandla um okkara statsrættsliga stilling í ríkinum. Til tað vilja vit ikki útpeika nakrar menn, vit vilja halda okkara hendur reinar. Um nakað ilt verður burtúr skal ansvarið falla á teir menn, sum fordu okkum so vitt, at ein kommissión bleiv nødvendig. Men annars tvist og ikki í at fáa vit eina sovorðna kommissión, so verður hon akkurat sum vit sambandsmenn vilja hava hana, tað kundi ikki fallið statsministara Zahle inn at ganga inn uppá teir villmenn, sum man frá sjálvstýris síðu vil hava hann til. Lat okkum nú siggja um henda kommissiónin verður so, sum sjálvstýrismenn vilja hava hana! Eitt er sikkurt: niðri í Danmark verður henda kommissión ikki væl umdirtikin. Ein hópur av donskum bløðum hevur vent sær ímóti tankanum, tað danska fólkið vil ikki hava nakra kommissión til at tinga um okkara stoðu, soleiðis sum tað var gjort við Ísland. Ølt tey bløð, og havi seð, eru ímóti, hvort einasta eitt.

Tingmaðurin í Kirkjubø tekur til sambandsprogrammið sum bevís fyri, at Føroyar er eitt land og Føroyingar eru eitt fólk. Ja, geografisk sæð eru Føroyar eitt land, men eru einki ríki fyri tað, tað er ikki eitt land í forhold til Danmark sum Ísland er tað; tað er eitt amt við framíhjárætti. Líkaleiðis er tað natúrligt, at vit tosa um eitt føroyska fólkið í okkara programmi. Hvat skuldu vit ellars sagt? Vit kundu ikki úttrykt tað korrekt uppá annan máta. At Føroyingar eru ein fólkaflokkur, sum í nongum er forskelligur frá tí danska fólkinum havi og altið verið vilhugur at indramma.

Tingmaðurin í Kirkjubø veit væl, hví vit ikki vilja forhandla við Zahle. Vit hava sagt tað, at vit vilja ikki forhandla við hann, fyrrenn hann hevur tilbakakallað sínar fornermilsir móti tí føroyska fólkinum, sum vit representera, ikki tí, at hann inntekur ein annan stilling til danskan politikk enn vit. Hansara fornermilsir goldu nitt føroyskt politiskt spursmál. Vit hava ikki sagt, at vit ikki vilja forhandla við ministaran. Bæði Effersøe og eg hava lagt fyri dagin, at vit ofta hava forhandlað við ministaran, og tað hevur ikki gjort okkum mun um hann hevur verið radikalur ella ikki radikalur. Eg skal enda við at siga til Mortensen, at her drejar tað seg ikki um persónlig fornermilsir. Tann núverandi ministurin vil fullvæl forstanda okkara stoðu. Vit eru borgarligaðir til at fransota hetta botingilsi, tí vit kunnu ikki lata hansara briksl sita á ti føroyska fólkinum.

J. Patursson: Eg skal mæla til, at málið fer til 3. viðgerð. Og tilsíðst skal eg siga, at vit siggja ongan annan máta enn henda til at fáa hesi stóru mál fram, enn at lata tey fara í eina fílika nevnd. Tað er væl frá báðum partum eitt ynski um at fáa nakað gjørt, og tað er eingin annar vegur ávístur enn hesin. Skuldi hin parturin kunna vist ein annan veg, so kunnu teir koma við broytingaruppskoti til 3. viðgerð.

O. Effersøe: Der kan ikke være Tale om at forhandle mere i denne Sauling om dette Spørgsmaal. Men Selvstyrepartiet kunde lade Forfatningsforandring og alt, hvad der snager deraf, falde.

J. Patursson: Hvussu skattalógin og logtingslógin kunnu fremjast í hesi nevnd, kann væl ikki sigast frammanundan.

A. Samuelsen: Bæði skattalógin og logtingslógin kunnu fremjast á tað grundarlag, sum vit logdu fram ífjor.

R. Rasmussen: Tað er órímiligt frá sambandsmonnum at krevja, at sjálvstýrismenn skulu fremja logtings- og skattalógina á tað grundlag sum teir, sambandsmenn, vilja.

O. Effersøe: Nej, naar Selvstyrepartiet har faaet Besked fra sin kære Minister.

R. Rasmussen: Sjálvstýrið hevur róliga umbugsað allar møguligheitir og tekur ikki hensýn til, hvat ein ministari meinar.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur leingdur 13. september.

Tingmannaloysn.

2. viðgerð.

H. A. Winther: Eg skal mæla til, at sakin fer til 3. viðgerðar.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Hækkan av samtalugjaldinum.

3. viðgerð.

M. A. Winther: Eg skal gera kunnugt, at nevndin hevir framsett uppskot til broytingar av tí uppskoti, ið var framlagt ígjár. Gjaldið fyri telefonabonnement utanfyri Havnina utan frían samtalurætt í bygdini, ið var sett til at hækkast til 50 kr., fyrisláa vit nú bert skal hækkast til 45 kr. Hvat ið viðvíkur boðsending, fyrisláa vit, at millum 1 og 1½ km skal boð kosta 25 oyr, utanfyri 1½ km, 25 oyr -|- skjútsbaxt.

J. M. Matras: Eg havi við oðrum tingmonnum framsett eitt broytingaruppskot. Tað fyrsta vit fyrisláa er viðvíkjandi hækkingini av taxtini fyri abonnement utan fyri Havnina við frium samtalurætti innanfyri bygdina. Har halda vit, at tað má skiljast millum bygdir við fleiri og færri abonnentum, og fyrisláa tí, at abonnementið verður hækkað frá 40 kr. til 60 kr., hvar tað er meiri enn 10 abonnentar, annars frá 40 kr. til 50 kr. Eg trúgvi ikki, at administratiónin kann hava nakað ímóti hesum. Til c. undir punkt 1 halda vit, at tað er ov nógv at hækka abonnementið á bygd utan frían samtalurætt frá 30 —50 kr.; vit halda tað vildi hóska betur at hækka hetta frá 30 kr. til 40 kr. So koma vit til boðsendingina, punkt 3 í útvalgsforslagnum. Vit fyrisláa 15 oyr fyri oll boð innanfyri 1½ kilometra, tí tað eru bygdir, ið eru nakað spjatt bygdar, og tað er órættferdugt, at sumar bygdir skulu hava dýrari boðpengar enn aðrar. Tey ið búgva langt frá stationini og tí skulu betala hesar dýrari boðpengar, tey hava undrunt longri at ganga til stationina, so tey hava dupult forbrøð av at búgva so langt burtur. Kanska tað er ringari fyri stationina at senda lesi longu boð, men tað eru eisini nógv stutt boð, og tey eru so nógv fleiri, at tað vil vera vinningur fyri stationina kortini tíð oll boð verða hækkað til 15 oyr. Boð utanfyri 1½ kilometra fyrisláa vit skal botalast eftir skjútstaxt. Táið tað nú frá einari station skal sendast boð til plass, ið liggja utanfyri markið (1 kilometra), so siga tey, man bíður fara boð, at tey fáa ongan at fara eftir skjútstaxt, men tey kunnu skaffa fólk at fara boð, um tey fáa, hvat ið vit kunnu koma yvireins um. Eg haldi tí, at okkara uppskot kann vera líka gott sum hitt. Sjálvt um tey fáa tey 25 oyr, sum útvalgið fyrisloer, eftirat, so vil nuan kortini ikki uppnáa, í hvorjum einkultum tilfelli at fáa sent lesi longu boð. Eg vil anbefalla okkara uppskot.

M. A. Winther: Eg skal bert halda meg til, hvat eg havi sagt fyrr. Til Matras vil eg siga, at okkara uppskot viðvíkjandi boðsending er bygt uppá sama princippir sum telefongjaldið yvirhovur, at jú longur stoðurnar eru burtur frá hvorjari aðrari, jú meiri kostar samtalan. Á sama hátt, jú longri veg tað skal sendast boð, jú dýrari verða boðini. Man hevir aldrei bestritt, at tað má vera soleiðis, hetta hevir verið brúkt í telefonini, í telegrafini, alla staðni. Eitt fólk, ið vil fara hiðani til Keypmannahavnar, má gjalda meira fyri ferðina enn eitt, ið fer til Suðuroyar. Teir ið hava framsett broytingaruppskot skuldu haft hækkað boðpengarnar. Tað er klagað frá næstan øllum stationum yvir, at boðpengarnir eru ov lítlir. Tað nyttar ikki at seta betaling fyri boðsending eftir skjútstaxt, tað fast jú, sum Matras sigir, ikki fólk til at fara boð fyri tann pening; eftir okkara uppskoti fáa tey 25 oyr -|- skjútstaxt. Hatta broytingaruppskotið vil bróta við tey princippir, ið hava verið ráðandi við ásetuna av taxtum fyri telefonina, og eg vil tí ikki tilráða at samtykkja tað. Ísinni haldi eg tað er nakað lítið at hækka abonnementið á bygd utan frían samtalurætt til 40 kr.

J. M. Matras: Winther forsvarar sítt standpunkt, og tað er einki at siga til tað. Hann sigir, at tað er oin ov lítil hæðkan av boðpengunum, vit fyrisláa; eg haldi tað vil virka sum ein hæðkan av 50 pct. yvirhovur, tí tey flestu boð, ið send verða, eru stutt. Tá hann so fraunheldur, at øll, sum búgva óhagligari fyri skulu betala meir enn hini, so haldi eg tað ikki vera rætt. Vit hoyrdu fyri kortum her á tingi í einari aðrari sak, hvar talan var um nógv størri pengastummar, framhildið, at útroiðsluna kundu javnast uppá oll fólk, so tey, ið búgva langt burtur, skulu betala líka nógv, sum tey, ið búgva nær hjá. Tað hevir einki at týða, táið man hevir sent boð til markið, so at ganga nokur skrift aftrat, og stationirnar eru ofta ógvuligar kedlar yvir at skula senda lesi stýru boð, og fólk, ið býr langt burtur, er sjálvsagt ikki fegið við at skula betala meir í boðpengar enn tey, ið hava stytri veg at ganga til telefonina. Stationirnar krevja meiri løn fyri arbeiðið, men boðpengarnir hækka so lítið, so tað hevir einki at týða at hæðka teir.

M. A. Winther: Man kundi sagt, at táið ein hevir gingið 20 míl, so kann ein líka vel ganga 5 míl aftrat, tó tað ikki verður heilt tað sama, men táið man skal kunna ganga nakur fá skritt yvir markið, hvar verður so markið, verður tað ikki flutt longur og longur út? Uppskot okkara er til fordeil fyri stabbónirnar; og veit, at tað eru stationir, hvar loddpengarnir hava rættuliga nógv at týða. Tað er eitt stóðugt róp frá bygdastatiónunum: Hækkið loddpengarnar! Styttið um avstandirnar! Nú hava vit korkini fyri at ímøtukoma tí telefonerandi publikummunum forplikta stationirnar til 1½ kilometra á sonn tíð sum vit hava hækkað loddpengarnar. Eg eri Jógvan Poulsen takksamur fyri at hann bar hetta fram, sum vit í nevndini áttu at hava ansað eftir.

M. Samuelsen: Eg havi saman við tingmannunum á Viðareiði og tveimum oðrum sambandsmonnum stillað endringsforslagið. Orðfæarin fyri nimitalið hevur noti verað tað so vrol, at eg ikki hava stórt at leggja afturat. Tað nyttar heldur ongki, tí vit vita tað frá fyrr, at tað verður ikki viðtikið, hvussu væl tað er motiverað. Eg vil tó vaunt anbefala ollum teimum tingmonnum, ið ikki eru heilt forkeinaðir til at steðga fyri endringsforslagnum.

J. M. Matras: Eg havi ongatíð gingið 20 míl í senn; um so var, vildi eg helst sloppið frá at gingið 25. Eg havi altíð verið góður við telefonstatiónirnar, men eg siggi ikki soleiðis uppá tað, at vit við okkara hækkan bara skulu hugsa um at ímøtukoma statiónunum og ikki taka hensýn til at publikum líður undir tí. Her eru stór fordýrilsir fyrisligin í telefonsamtahunum, skulu so samtíðigt boðini bliva o. a. dugandi so dýr, so vil tað folast nógso nógv í fleiri bygdum. Eg vil tí anbefala at steðga fyri okkara uppskoti.

M. A. Winther: Matras lykist ikki at vilja gera okkum tað inurommilsi, at vit hava verið ímøtikomandi móti publikum í tí, at vit hava forpliktað stationirnar til-loddsending innanfyri 1½ kilometra og fyrst tí tað verður longir lagt skjútstaxt á. Hendla veglongd tokkur í almindiligheit um alla bygdina. Matras fyrisatar fyri hesa boðsending 15 oyr. Eg trúgvi ikki, vit fáa fólk yvirhovur til at gera tað fyri tað hetaling; tað er sum sagt eitt stóðugt róp um at hækka boðpengarnar, heldur slíta hesa fortjenastu upp í tuflum og skógvum, tá tað hert er 10–15 oyr. Kemur tað harímóti uppí 25 kann tað betýða á sinum plássum einar 150–200 kr. um árið. Matras má erkenna tað, at tað telefonerandi fólkið spyr ikki somikið eftir, hvat tað kostar sum at tey kunnu fáa skjótt og lagaligt forhindilsi. Tað er jú ikki fólk yvirhovur, sum telefonera javnt og stótt – fyri tey betýðir tað ikki stórt, tað tey telefonera einar 3–4 ferðir um árið – – nei, tað eru forretningsmennirnir, telefonabonnentarnir, sum geva tað stóra kontingentið til telefonina, so hesin evnisleikin frá Matrassar síðu er heilt óbehoviligur.

Nevndaruppskotini vórðu samtykt.

Havnabygging.

2. viðgerð.

Ordføraren (J. H. Poulsen) greiddi frá nevndarálitinum, sum gekk út uppá, at tingið biður fiskimálaráðið um skjótast gjørligt at fáa fyr havnir bygdar, sum eru nevndar í lógini av 29. apríl 1913, saman leiðis pinsverkini suður í Vági, í Klaksvík og á Sandi og motorbátahavnina í Hovi. Ordstýrarin framhelt, at málið um bygging av høvnum í Føroyum er tað stórsta málið, sum er frammi nú á dogum her á landi og at hetta verk má, tí ella onnur fólk kappast um at búgva sínar viðurskiftir til, má framjast skjótt, um eru tað er so, at tíðirnar í stundini ikki eru lagaligar. Um vit ikki búgva okkum til í hesum máli, og um vit ikki gera tað skjótt, koma vit at verða skúgvaðir út úr leikinum av oðrum fólkum. Ordføraren vildi tí uppá tað besta mæla tinginum til at taka væl við nevndaruppskotinum.

R. Rasmussen: Í hesi sak hevir verið uppaftur tikin ein sak um havnarumlegg í Klaksvík. Hon var fyri í 1916 og 1917. Í 1917 er komið svar aftur frá ministeriinum fyri offentligum arbeiðum, ið átalar, at ministerið ikki finnur, at nakað fyri tíðina kann gerast við hesa sak. Sakin var aftur samtykt ifjor. Nú fyriliggur altur svar frá ministeriinum, at einki kann gerast við sakina. Hetta er eitt kulbutt svar uppá eina sak, sum allar kommunur í Norðuroyggjum hava framhildið sum eina livssak fyri Norðuroyggjar og sum logtingið einmælt hevir samtykt. Hetta er eitt

doni uppá hvussu tað, ið Føroya løgting heldur verður neyðsynt at gera fyri landsins framburð, verður behandlað av myndugheitunum niðri í Danmark. Tað var bert fyri at framfora hetta, at eg havi biðið um ordið.

A. Samuelsen: Eg havi eisini verið hálvt illa við hetta svarið frá ministeriinum, ið tvær reisur er givið okkum. Men eg kann kortini ikki uppfata tað sum R. Rasmussen. Man eigur jú altíð, at taka alt upp í bestu meining. Ministeriið meinar væl sum so; vit hava eina lóg av 1913 eftir hvørjari er hevilgað pengar til havnabygging í Føroyum, men kríggið hevir fordað fyri at fáa materialier harupp. tað hevir verið ómogidigt at byggja til tær høgu prísir, ið verið hava, tað hevir verið ómuguligt at fáa nakrau at taka arbeiðið í entreprise, og so hevir ministeriið væl hugsað sum so, at so leingi einki er gjørt av tí, sum er samtykt, er ikki vert at játta nakað nýtt. Men táið vit hava fingið havnasakina í eitt betri lag, og hesi arbeiðir verða byrjað, so vilja teir óivað eisini fremja havnasakini í Klaksvík. Soleiðis skilji og tað, og ikki sum R. Rasmussen; hann framsetti sína fortolkning so ógvuliga agitatorisk. Sjálvt um R. Rasmussen hevði verið trafikkministari mundi krígnum, hvat hann tíbetri ikki hevir verið, so hevði hann ikki kunnað svarað annað enn ministeriið her hevir svarað. Vit vita, at tað frá tinginum er sett extra press uppá at fáa einstok arbeiðir av hesum sett í gongd, t. d. á Hvalbiareiði, men har er einki komið í lag. utan at brúgvin hevir máað um meira burtur av landinum. Men nú vil tað vísa seg, um grundin til, at einki er gjørt, er illvilji ella tað at einki kann hava verið gjørt av orsøkum, ongin hevir verið herri yvir.

O. Effersøe: Jeg opfatter Hr. R. Rasmussens Udtalelser som et Ord i en Fremgangsmaade, der gaar ud paa, at skabe en Modvilje mod den danske Regering her paa Øerne, en Fremgangsmaade, som der paa det kraftigste maa protesteres imod.

R. Rasmussen: Í at skapa illvilja móti eintari regering vil eg lata hr. Effersøe hava yvirtakið.

J. M. Hansen: Eg má siga, at eg betrakti ikki hetta sum eitt rætt avlag, men at tað skal siggjast soleiðis, at tað ikki kann fremjast einsamalt, men bert saman við hinum havnabyggingunum, ið vóru samtyktar í 1913. Eg vænti tí, at táið tað nú kemur niður saman við hinum uppskotunum og so kemur aftur til okkara, so verður henda sak komin í eitt betri skil.

J. Guttesen: Maur dámdi ikki væl, tá eg sá hesa betonkning, tí her er ein bygd burturgloymd, ið hevði fingið bevilling í 1913, navniliga Kvívík. Tó hoyrdi eg, at ordføraren nevndi hana í talu síni. Nú kann tað gangast út frá, at hetta bert er eitt forgloymilsi, so eg vil biðja ordføraran fáa navnið á hesari bygd sett uppí aftur uppskotið. Soleiðis var eisini við einum vegi gjøgnum Kollafjarðardal, Kvívíkingar hevdu fingið lyfti um at fáa stuðning til; táið uppskotið kom fram, var Kvívík burturgloymd. Eg veit ikki, hví teir altíð skulu vera so fyri óhappi.

J. H. Poulsen: Eg skal hartil siga, at tað nevndarálit, Guttesen har hevir, er ein avskrift; navnið á Kvívík var dottið burtur úr í nevndarálitinum, og eg havi rættað í ollum avskriftum og sett tað aftrat, utan í teirri avskrift, sum Guttesen hevir, tí hana havi eg ikki kunnað funnið. Men Kvívík stendur altso nú nevnt í nevndarálitinum.

A. Samuelsen: Eg man siga, at tað er fullstendiga líkagyldugt, um hatta stendur í betonkningini ella ikki, tá tað stendur, at vit vilja hava allar havnabyggingar framdar, ið vóru nevndar í lógini av 1913, tí har var Kvívík nevnt. Viðvíkjandi vegaanleggjunum, so er tað aldeilis ikki dottið burtur úr; Kvívík hevir har líka góðan stilling sum aðrar kommunur, so hava teir sagt fyri mær í ministeriinum. Tað er har tala um nakrar nødvendigar útrokningar, ið skuldu gerast í vatnsbyggingarvesinum, og sum skuldu vera greiðar, áðrenn hetta arbeiðið kann útførast.

J. Guttesen: Eg hoyrdi ikki hvørt ífjor, enn at mín avrøði síðumaður, Mikkjal Samuelsen, stóð her og fortalði, at vegsakin í Kvívík var dottin niður(yri, og at hon av honum var reist av nýggjum.

M. Samuelsen: Eg segði burt ífjor, at tá hesir vegir vóru undirsoktir, var tann úr Kvívík ikki við; hvussu hað hav til, veit eg ikki, men tá ingeniørarnir vóru her, var hann ikki undirsoktur.

A. Samuelsen: Viðvíkjandi havnaanleggjunum má eg siga, at eg kann ikki

síggja, at tað kann gera hvørki til ella frá, um Kvívík er nevnt í betonkningini ella ikki. Táið Kvívík er nevnt í lógini, so er bygdin vís í at fáa sína havn so væl sum hini plássini. Og um tað stendur í tí avskrift, ið Guttesen hevir ella ikki, gor onn minni. Nakað annað var, um Guttesen vildi gjort okkum uppmerksamar uppá Kvívík, og vildi haft okkum til at royna at fáa meira gjort fyri bygdina enn hon er nevnt; tað havi eg lovað teimum at hjálpa teimum við, og tað vil eg gera. Guttesen skuldi heldur nevnt hetta, sum Kvíkingar ynskja útyvir tað, sum stendur í lógini.

J. Guttesen: Eg ori væl vitandi um tað, ið Kvíkingar ynskja, og eg vil spyrja A. Samuelsen, hvussu hann heldur tað verður best framt. Men eg má halda fast, at táið hinar havnirnar eru nevndar í betonkningini, hví skulu teir so útiláta Kvívík.

J. H. Poulsen: Sjálvandi er tað, ið tað kemur an uppá í einari sak, innstillingin til ministeriið, og í henni er altso Kvívík nevnd, men eg dugi væl at fata, at Guttesen hevir funnist at, at navnið ikki var komið við í nevndarálitinum. Guttesen hevir horið fram fyri mær, hvat tað er, Kvíkingar ynskja meir enn oftir tí gamla uppskoti, men eg havi ikki hildið tað loyst seg at laka um tað í nevndini, tí tað, ið umræður, er at fáa sakina á gongd, og tað fáa vit lattast í tí skikkilsi, sum lógin hevði í 1913. Samuelsen hevir heldur ikki umtalað hetta í nevndini. Tað er tí ikki boint av honum at seta at Guttesen, tí hann er ikki komin fram við hesum offentliga.

A. Samuelsen: Nei, eg finnist ikki tí at Guttesen, og heldur ikki at nevndarformanninum, tí hann ikki hevir borið hetta fram. Men táið Guttesen framfórir hetta um, at Kvívík ikki stendur í nevndarálitinum, so fekk hann at vita ígjár, at tað var ein fejlskrift og at tað skuldi rættast, og tá hann so kortini kemur fram við hesum í dag, so má okkurt liggja undir. Eg vil bert hor siga, at Kvívík er aldeilis ikki gloymd.

J. Guttesen: Eg veit ikki, hvat A. Samuelsen meinar við, at eg fekk at vita, at tað skuldi rættast. Eg havi nevndarálitið liggjandi fyri mær; veit eg, um tað verður gjort? Gera menn altíð tað, teir lova? Eg vildi bert hava sikkurheit fyri, at hetta varð gjort.

A. Samuelsen: Eg haldi tað vera lógið, at Guttesen ikki vil líta nevndarformanninum tað til, at táið hann lovar at retta hetta, so gor hann tað eisini.

J. H. Poulsen: Ja, Guttesen meinar væl, at formaðurin kundi hava gloymt at retta tað, og vildi tí minna hann á tað.

A. Samuelsen: Eg hevði ikki minni interessu fyri hesum enn Guttesen, men og trúði formanninum uppá hansara orð, at hann vildi retta tað, táið hann lovaði tað, og tað hevir hann jú eisini gjort. Tað var tí, eg ikki kom fram við tí, ikki tí og hevði minni interessu av hesum enn Guttesen.

Th. M. Strøm: Sum allarebda nevnt av orðforanunum, var tað kóðiligt, at havnabyggingin ikki var byrjað áðrenn kriggið kom at forða fyri tí. Serliga fyri Tvoroyri viðkomandi hevir hetta verið til tarna. Har var alt klárt til at byrja arboiðið; grundarnalir vóru fingin og forhandlað var um entreprise, so um tað var byrjað tá, hevði tað kanska verið liðugt, áðrenn prísirnir vóru komnir so hogt upp, at tað var óbyggjandi.

A. Samuelsen: Sjálvsagt er tað bæði klagiligt, at hesi arlegg ikki vóru bogynnt áðrenn kriggið kom, og eg beklagi eisini, at havnin har suðri ikki kom ílag. Men kundi jú tonkt sær, at tað hevði kunnað verið fortsett, um tað var liðið burtlioiteað; gauska vist hevði tann tá bestandandi kontraktin blivið annullerað, tá tað vísti seg, at allir prísir vóru somógv forandraðir og tilfarið, sum brúkast skuldi, ikki kundi fáast. Men her er jú eingki við at gera. Tað kann vera forstáiligt, at mann á sterkh interesseraðum plássum sum suðri í Suðroy og aðrastaðni hevur royndt at finna út, hvor ið skyldina hevði fyri, at hesi arlegg ikki komu ílag og m. a. hevur mann sikfað mog fyri at hava forsomt havnasakina, ja í einum avísartíkli eri eg eintá blivin beskyldaður fyri at hava forpurrað, at hon kom í lag. Eg skal tí líka novna, at eg sum landstingsmaður saman við tí táverandi folkatingsmanni arboiddi fyri sakini og fekk somikið av skafti, at har kundi verið gjord forberoiðandi arboiðir suðri á Tvoroyri, um forstandarskapið ikki hevði lagt seg í luktina. Tað hevði haft sín betýdning, at hesi arboiðir vóru blivin gjord, tí so hevði arlaggið verið bogynt. Annars havi eg bræv frá ministeriinum uppá, at eg ikki havi for-

purrað sakina, tað teir vita um í hvussu er. Eg hevði anleidning til at spyrja ministeriið av teimum siktilsum, sum roðtað vóru móti mær, og og má siga, og eri ógviliga fornøjaður við svarið.

Th. M. Strøm: Eg havi ikki siktað Andrass Sámalsson fyri nakað. Hann um tað, hvat hann hevur gjørt ella ikki gjørt í hesi sak.

A. Samuelsen: Eg havi ikki siktað Strøm fyri, at hann skal hava siktað meg. Hr. Strøm kann ellars vera yvirhevístur um, at eg veit akkurát, hvat eg havi gjørt.

Th. M. Strøm: Um vit har sunðri hevdu fingið lov til at begynna uttan licitatión, vildi nógv verið vunnið fyri okkum. Tóat bæði arbeiðslønir og alt annað var hækkað, vildi firmaið Saabye & Lerche kortini standa við sítt gamla tilboð og gera anleggið eftir yvirslagssummuna.

A. Samuelsen: Eg var í teim døgum til eitt møti í trafikministeriinum, har hesin spurningur var til umtalu. Teir søgdu har, at teir hevdu ikki lov til at læta nakað anlegg pábegynna uttan at tað fyrst var burtliciterað. Í havnalógini er jú eitt bestommilsi nú, at tað, sum avloyppur frá hinum anleggunum, skal anvendast til anlegg í Vági. Vatnbyggingsdirektørurin, sum har var tilstaðar, upplýsti, at fyrisavítt sum hetta bleiv burtliciterað, vildi man frá Tvøroyrar anlegg kunna spara o. u. 70.000 kr.

Edv. Mortensen: Tað sum hr. Samuelsen siktar til, tá hann sigur, at forstandarskapið fyri Frøðiar sóku legði seg í bøktina, var nakað grótarbeiði, sum ministeriið hevði givið stuðning til sum ein forsmálsliðning móti arbeiðsloysi — í likleit við tey vegarbeiðini, sum tá vóru útboðin. Tað kundi aldeilis ikki uppfatast sum nakar *begynningur* til havnaanleggið. — Tað dreyaði seg ikki um meira enn í 6000 kr. og heila anleggið var jú ansligið til gott og væl 200,000 kr. Hvussu vítt Andrass Sámalsson er skyld í, at henda sakin strandaði, skal eg ikki úttala meg um, men eitt stendur fast: hann var inóti at firmaið Saabye & Lerche fingu pábegymt anleggið í 1914. Tá fyrilá alt klárt frá kommununi. Men hr. Sámalsson vildi ikki anbefala tað - úttrá teim sonn rasonnementum sum amtmann Rytter. Í lógini er nemliga eingi, sum pábýður licitatión, og tað hevði tí verið fult forsvarligt at móttaka tilboðið frá Saabye & Lerche. Um Andrass Sámalsson her hevur handlað rætt ella galið er ein skjønssak, men givið er tað, at var tilboðið tikið við tá, so hevði hetta anlegg nú verið liðugt.

O. Effersøe: Hr. Strøm har den Egenskab at fremføre vene Selvfølgeligheder. Det er en Selvfølge, at hvis Anlægget i Trangisvaag var blevet paabegyndt for flere Aar siden, saa vilde det have været billigere, end det nu har Udsigt til at ville blive. Det har egentlig ikke stor Interesse nu, mere Interesse har det at faa oplyst, hvad Aarsagen var til, at det den Gang ikke kom i Gang. Jeg tror, at det for en stor Del laa i selve Ordningen. Naar man skal løse en saa stor og vanskelig Opgave, er det ikke altid saa let at faa den ordnet, som ønskeligst kunde være; man er gerne nødt til at tage Tingene saadan, som de ligger for. Havneloven var fuldt forsvarlig og god. Skylden for Standsningen maa søges i Krigens Udbrud, og saa for en Del deri, at Kommunerne var for langsomme i Vendingen. Ministeriet mente ikke, at kunne overlade dette Anlæg til et bestemt Ingeniørfirma, da man mente at have Grund til at antage, at Anlægget kunde udføres billigere, hvis det igen blev burtliciteret, og det vilde man først undersøge. Jeg havde ikke med Sagen at gøre, da denne Afgørelse blev truffet, men senere, da Situationen forelaa saaledes, at der var Grund til at acceptere Saabye & Lerches Tilbud, og man ikke kunde gøre Regning paa at faa Anlægget billigere, henvendte jeg mig til Firmaet, og fik til Svar, at det var rede til at udføre Anlægget for den Betaling, som det tidligere havde forpligtet sig til. Allerede dette tyder paa, at de fra først af har beregnet sig en rigelig Pris. Jeg henvendte mig derpaa til Tradikministeriet, men hur fik jeg den Besked, at Ministeriet kunde intet gøre. Siden hen blev Forholdene rent umulige, saa der ikke kunde være Tale om at foretage sig noget.

Th. M. Strøm: Tað er gott, at Effersøe ikki ræður fyri, hvør ið skal hava orðið á tingi; eg má væl hava sama rætt til at úttala meg sum aðrir lingmenn.

Eg hugsi hr. Mortensen fer skeivur, tá hann sigur, at amtmann Rytter helt uppá at anleggið skuldi burtliciterast. Tað skal nokk liggja eitt skrivilsi hjá forstandarskapinum, har amtmann Rytter nettupp

anbefalar at arbeiðið verður útført uttan licitatión, og at Saabye & Lerche útføri tað.

O. Effersøe: Jeg vil fremholde min Ret til at gøre Bemærkninger til det, som Ström siger.

A. Samuelsen: Um tað sum hendi í 1915 viðvíkjandi pieraulegginum við Tvøroyri, so meintu teir í ministeriinum, at man skuldi royna at fáa hvørt einkalt anlegg so biligt sum møguligt, fyri at tað skuldi loypa nakað av til Vág. Tað stendur í lógini, at Vág skal hava avlopið. Eg havi pressað uppá, at teir skuldu burtlicitera arbeiðið. Um tað ikki var gjørt, so skuldu teir láta tað til Saabye & Lerche. Nakað annað er, at ministarin kundi hava skundað sær meir til at forbereiða sakina til licitatión. Til tað, sum er nevnt um umboðsmann Ryttor, skal eg siga, at hann hevur ikki forpurrað anlegginum har suðurí. Mortensen sigir, at um anlegið varð givið til Saabye & Lerche, so hevði man fingið tað útført. Men kanska teir tó í 1916 -17 vildu sleppa sær burt úr kontraktini. Teir á Tvøroyri hava forbereitt sakina so væl, sum nakar annar. Men eg mátti á einum lánuinstitutti í Keypmannahavn royna at fáa pengar til teir.

Edv. Mortensen: Tað skuldi vera fult forsvarligt at geva Saabye & Lerche anleggið upp í hendi. Tilboðið var 16,000 kr. undir yvirslagssummuna. Og um eins nógv varð spart frá hinum anleggunum, so hevði tað verið 90,000 kr. til avlóps til Vágs. A. Samuelsen og Ryttor hava mótsett seg, at anleggið varð givið til Saabye & Lerche, og har hava teir ikki handlað rætt. So er mín meining; eg veit ikki, hvat aðrir halda. Anleggið hevði sikkurt tá verið gjognumført, tí kontraktin hevði verið í ordan áðrenn kríggið kom. Fraktirnar fóru ikki so nógv upp fyrst tá kríggið kom. Og teir hevdu tá kunna sikrað sær connaut. Og um onkri hevði forstandarskapið har suðurí alt í ordan, tá teir vendu sær til Saabye & Lerche og fingu avslag. Men hvi burtlicitoraði ministeriið ikki verkið alt fyri eitt ístaðinfyri at bíða við tí.

A. Samuelsen: Mortensen segði, at um Saabye & Lerche fekk anleggið, kundi tað verða spardar 16,000 kr. Men eg kenni til, at direktør Westergaard segði, at um anleggið á Tvøroyri varð burtlicitorað á hesari tíð, sum her er talað um, so máttí mann ganga út frá, at tað kundi sparast 10—20,000 kr. Eg havi ikki havt líkindi at seta meg ímóti, at arbeiðið varð givið til Saabye & Lerche. Men arbeiðið máttí væl burtlicitorast fyrst. Eg hoyrdi frá einum Suðroyingi, at um Saabye & Lerche fekk hetta arbeiði, so vildi hetta felagið tjena 100—200,000 kr. Mortensen spyr, hvi ministeriið ikki burtlicitoraði hetta arbeiðið fyrr. Ja, tað er ikki mín skyld; eg havi pressað á, alt eg var mentur. Skyldin er heldur ikki amtmans Rytters. Mortensen má tí spyrja kraftkeministaran; um hann enn er Mortensens partímaður, so eigur Mortensen at geva honum eina ábreiðslu fyri hetta.

Th. M. Ström: Frøðiligar sakkunnir kommuna hevur ikki verið seinrokin. Hon fekt yvirslagið gera langt undan at lógirnar vóru samtyktar á ríksdegi, og forstandarskapsformaðurin fór til Keypmannahavnar aftan á at skrivilsi var komið frá amtmanni um at anleggið skuldi byggjast av Saabye & Lerche. Men so vísti tað seg, at ríksdagsmenninir vóru ímóti tí, teir vildu hava tað burtlicitorað.

O. Effersøe: Jeg har ikke sagt, at det var Frodebo Kommune alene, men alle Kommunerne. Med Hensyn til Spørgsmaalet om Sagens Forberedelse, saa var det allerede i 1915, at jeg som Formand i Forstanderskabet foretog det fornødne og fik Sagen undersøgt ved et Ingeniørfirma.

A. Samuelsen: Eg vil siga nakað við Ström, sum framhaldur, at ríksdagsmenninir hava sett seg ímóti sakini. Hvar stendur tað? Tað kann tó ikki ganga ann, at mann sendir slíkt út í verðina uttan at hava nakað at halda seg til.

Th. M. Ström: Eg meinti, at teir vóru ímóti, at anleggið varð latið burt uttan at tað bleiv útlicitorað.

Edv. Mortensen: Tí tað er sagt, at Saabye & Lerche skuldi tjena 100—200,000 kr. uppá hetta, tá er slíkt so vitleyst, at man ikki kann svara tí aftur. Verkið skuldi kosta 325,000 kr. og so skuldi tað kunna tjenast upp til 200,000 kr. uppá tað! Og tað er heldur ikki rætt at firmaið skuldi kunna tjena 70,000 kr.

A. Samuelsen: Eg vil bara siga, at Westergaard segði, at mann kundi tjena

70,000 kr. uppá tað. Viðvíkjandi tær 100—200,000 kr., so er tað ikki mín meining, sum eg havi flutt fram. men tað, sum ein maður segði fyri mær. Ég haldi meg til, hvat Westergaard hevir sagt, hann hevir, sum hr. Mortensen segði, haft sakina til erklering mangar ferðir frammanundan. Táið eg rættaði tað bestonta spurmál til hansara: kann man gera kalanlegg á Tvoroyri billigari, so svaraði hann, at hann vildi hugsa um tað fyrst. Síðani svaraði hann, at man kundi spara millum 60 og 70,000 kr. Ég haldi ikki, at tað hevir nýtst vatnsbyggingarvesiinum at vera engstiligt, tí tað var avgjort, at tað ið leyp av, skuldi goymast til seinni í Vági. Strom sigir, at hann meinar ikki, at vit í ríkisdegnum hava verið ímóti anleggjunum, men ímóti, at tey vóru givin burtur í licitatión, ja, tað vóru vit, tí vatnbyggingarvesnið malti til tað.

O. Effersøe: Det var Regeringen, der havde undersøgt Forholdene ved Havneanlægene paa Øerne ved sin egen udsendte Ingeniør. At Regeringen dog har benyttet Saabye & Leroches Overslag, var vel kun af Velvilje overfor Havneanlægene.

D. J. Thomsen: Eg eri einigur við orðforaranum í tí, hann segði, at tað var eitt alment ynski í Føroyum, at havnasakin verður framd í einari nærari framtíð, og eg vil siga fyri meg sjálvan, at heldur vildi og sæð havnaanleggini um havnalógina. Havnaanleg í Føroyum vildu haft ómetaligan týdning fyri okkara handilslív og fiskarí; hettar hevur mest víst seg nú undir kríggjum við tað at vit hava betalt nógv meira fyri okkara vørur, enn vit annars hovdu verið noydd ir, netupp tí vit ikki hava haft havnir, og so leingi vit ongar havnir hava, vilja vit koma at gjalda so mikið hærri fraktir, bæði fyri innførdar og útflutnings vørur, alt hetta dettur niður á tann almenna mannin. A. Samuelsen sagði, at alt eigir at verða tikið upp í bestu meining; tað ljóðar ógvuliga væl; men tað er eitt annað orðatak, sum sigir: Mens Grasset gror, dor Horsemor! Og hetta hóskar væl at siga táið talan er um havnabygging í Føroyum. Tað ið fekk meg at biðja um orðið, var, at tað varð sagt, at Vágbingar skuldu fán uvlopið av Tvoroyrar havn. Tað varð hildið fram á tingi ífjor, at tað vóru Vágbingar ikki tilfreds við, og tað eru teir heldur ikki í ár. Tað svar, Klaksvíkskingar hava fingið frá ministeriinum uppá teirra umsóku, tykir mær heldur undarligt, og skal svarið til Vág sukjast í havnalógina av 29. apríl 1913, tí annað svar hava vit onki fingið enn, ja, so sær svart út fyri okkum hær suðuri í Vági.

A. Samuelsen: Tingmaðurin sunnan úr Vági eiteraði eitt orðatak, ið sigir so mikið sum, at tann góða tíð kann forleypa og vit kunnu koma at betala tað ov dýrt at bíða; tað svarar beinleiðis til, hvat ið framgongnr av uppskotinum frá útvalginum. Eitt annað er, hvat man kemur inn uppá, tá man fer at kanna eftir, hvor ið hevir skyldina fyri, at tann góða tíðin er forlopin. Vág hevir fingið eina ringa stoðu, og eg haldi ikki, at Vágbingar kunnu vera tilfreds við hana, um man í framtíðini vil halda uppá, at teir skulu koma aftaná Tvorámenn. Eg hevði hetta frammi í ríkisdegnum fleiri ferðir, seinast ífjor. Eg trúgvi kortini ikki, at Vágbingar skulu siggja so svart uppá hesa sak av tí svarið, ið Klaksvík hevir fingið. Man tað kanuska ikki her kann sigast: hann ið tegir, samtykkir. Ministeriið ger væl mun millum hesi plúss á tann hátt, at tað sigir: Vág kunnu vit ganga inn uppá, Klaksvík ikki.

D. J. Thomsen: Tað skuldi glett meg, um tað varð, sum A. Samuelsen sigir.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Látinskuli.

1. viðgerð.

S. P. úr Kongi: Tingmonn vilja minnast, at her ífjor kom uppskot inn á ting um at fáa látinskúla í oyggjunum. Tað var álagt skúlastýrinum at granuska hesa sak og fyrileggja úrslitið í tí núverandi tingseta. Skúlastýrið hevir grannskað henda spurning og meinar, at um hetta skal fáast í lag, má tað verða við einari broyting av tí núverandi realskúla, soleiðis, at hann fer fleiri farartar og fleiri klassar. Men sum viðurskiftini eru nú, meinar skúlastýrið ikki, at tað er leint at koma við nokrum uppskoti um hetta. Skúlahúsið er ov lítið, har mátti verðið bygt aftrat, og har

mátti verðið settir minst 2 nýggir lærarar við skúlaembætisprógvi, um tað skuldi kunna tíkist bert eitt av teim 3 studentaprógvunum.. Spurningurin er so stórur, at vit eiga altíð at hava hann fyri eygu og royna at fáa fleiri lærarar við realskúlan, so við og við; so kunnu vit við tíðini koma til at geva ungdómi okkara ta harri undirvísing eisini heima í okkara egna landi. Henda sak fyriliggur til eftirrettning, og eg havi nú í fáum orðum greitt frá honni. Skal eg mæla til, at hon verður vist í kirkjukassanevndina.

Sakin fór í kirkjukassanevndina.

Landistoðir.

2. viðgerð.

Orðføraria (M. A. Winther): Eg hugsi, at eg kann gera stutt av um hesa sak, tí vit hava allir kunnleika til, hvat helst mælir um. Her eru nógvar umsóknir komnar til tingsins um stuðning til landistroðir, men vit hava verið noyddir til at bera upp á mál at útseta tær flestu sakir. Orsøkin er tann, at økonomisk fond, av hvørjum útreiðslur til landistroðir, vegir og t.l. verða tiknar, í teim seinastu árum so gott sum ongar inntøkur hevir havt, utan sovorðnar, ið eru bundnar til bestemt endamál, og tað er tí, at hvalatollurin, ið hevir verið ein stór inntøka fyri tingið, í teim seinastu árum hevir verið eingin. Vit hava tí noydst at vera sparnir við bevillingum úr økonomisk fond. Tað er eisini óvíst við øllum útreiðslum til materialium, cement o. t., og kunnska hesi arbeiði til eina seinni tíð kunnu gerast fyri nógv bíligari kostnað. Eg skal taka nokrar einstøk av hesum uppskotum fram til umroðu og fyrisláa, at tær sakir, hvar øngin stuðningur er fyrisligin, verða avgjordar í dag, meðan hinar fara til 3. viðgerð.

(Greiddi frá nevndarálitinum viðv. sak nr. 1, landistoð í Rituvík.)

Uppskotið varð samtykt.

Orðføraria (M. A. Winther) greiddi frá sak nr. 2, Landistoð á Hallbardalangri, og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerðar.

A. Samuelsen: Eg havi einki at siga til, at sakin fer til 3. viðgerðar. Táið orðføraria byrjaði sína talu, var eg uppitikin av øðrum, og fekk tí ikki tá sagt frá, at eg eri ikki samsintur við orðføraranum í tí avatekningsmáta, hann fyrisær. Her er við hesa viðgerð tann einasta leyligheit, tingmenn hava til at koma við broytingaruppskotum, teir hava jú ikki haft leyligheit til at siggja sakirnar, fyrr enn tær fyriliggja her til viðgerðar. Men eg haldi tað ikki vera beint at nýta tann framgangsmáta, sum orðføraria fyrisær.

Eg trúgvi ikki, at hetta er ein avgerð av formanninum, tí so kann tað jú ikki broytast, men tað fyrikom mær, at tað bert var ein heinstilling frá orðføranarum um at nýta hendla framgangsmáta.

3. Landingarbrúgv í Porkeri.

Orðføraria greiddi frá nevndarálitinum.

4. Landistoð í Skálavík.

Orðføraria greiddi frá nevndarálitinum.

5. Landiviðurskifti í Skopun.

Orðføraria greiddi frá nevndarálitinum.

6. Landingarbrúgv í Haldórsvík.

Orðføraria greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at samtykkja fleirtals uppskotið.

A. Samuelsen: Vit hava tríggir — Effersøe, Matras og eg — ikki kunnað fylgst við fleirtalinum, men sett fram eitt minnitalsforslag í hesi sak.

Tóat hetta, sum fyrisligið er, ikki er meir enn ein lítil partur av tí, sum Víkarmenn vanskja, vil hendla brúgv vera teimum til nógva nytta, og ein góður begynningur til framhaldandi arbeiði, um tað einaferð evnaðist Víkarmonnunum at fáa tað brúgv, teir vanskja sær. Tað er tí rímiligt, at teir fegnir taka við tí, sum fáast kann, og eg havi eisini fatið mær fortalt, at teir vilja sláa seg til tols við hetta. Vit halda tí ikki tað er nokur grund til at fara aftur til forstandaraskapið at spyrja; teir eru forstandigir menn, sum

siga: Vit forlanga ikki tað ómuguliga; kunnu vit fáa hetta, so taka vit við tí. Útfrá hesum betraktuingum hava vit stilla okkara endringsforslag.

Eg skal leggja aftrat, eftirsum tað so ofta er framhildið, at tað og tað pláss einki hevur fingið av tingimum, at um tuo fer at granska øll løgtingsins rokuskapir og allar løgtingsberaðtuingar, so hugsi eg ikki, at nam vil finna nakað til lendingsforholdini í Haldorsvík. Eg vil biðja tingið um at stemma fyri hesum uppskoti. Skuldi tað vísa seg, at forstandarskapið ikki skuldi kunna útfora tað fyri hesar pengar, ja, so lata vit tað vera. Tað hevir verið so, at vit altíð her á tinginum hava hildið, at vit eiga at styðja fiskiskapin í Foroyum. Í Vik kunu menn siga, at allir eru útróðrsmenn. Brúgvin verður ikki einans til nytta fyri Víkarmenn, men fyri sóknina. Menn vita hvussu ofta Tjørnuvíkingar plaga at bjarga sær í Vík. Eg vil anbefalla forslagið frá minnitalinum og biðja fleirtalið taka sítt uppskot aftur.

M. Samuelsen: Eg havi ikki nógv at siga síðani ordførarin fyri minnitalinum hevur greitt so væl frá. Atvoldin til, at Víkarmenn biðja tingið um studning til lendistað er, at teir eru illa stillaðir við brúgvum. Fyrr hava bara róðrarbatar verið brúktir í Vík, men nú byrja motorbátarnir at koma, og teir yngru menninir í bygdini atla nokk at nera um teir og eru tí uppspentir at fáa hetta verk í lag. Hetta verður eitt dýrt anulegg, men tað er eitt ynski frá øllum bygdamonnunum at fáa tað og forstandarskapið vildi tí anbefalla tað. Tingsins álitismaður hevur verið har norði, og hann sigur: Eg kann ikki gera yvirslag yvir brúgv sum gongur longur út enn tað grynst á fjørd. Skal brúgvin ganga longur út, so má ingeniørurin gera yvirslagið. Álitismaðurin segði, at hann kundi gera yvirslagið uppá at brúgvin skuldi vera 16 m. út í sjógvin og maelti okkum til at lata hann fortsota longur út seinni við jarnskinnaenn. Og vit hildu, at vit skuldu gera tað soleiðis, og so seinni leingja um brúgvina. Fyritøkan nýtist ikki at stranda á hesum. Forstandarskapið hevur forhandlað við keypmenninar og spurt teir, hvat teir mundu vilja lata. Restorffs handil hevur svarað, at teir vilja styðja saleina við passandi beloyi og C. C. Johansen hevur svarað, at hann eisini vildu styðja sokina. Tann triðji er ein lítil keypmaður. Hann eigur eina brúgv, sum standur tolnliga væl fyri, og har er nokun at verkið skal gerast. Hann vil lata sína brúgv til hetta anuleggið. Tað verða nógvir pengar fyri tingið at lata til hesa fyritoku; men tað verður eisini nógv fyri kommununa og fyri bygdina har. Og tí teir álikavæl koma inn á tingið við hesum, so er tað ikki av øðrum grundum enn at teir ætla sær meir og meir at dríva útróðurin við motorbátum og at tað verður lagaligari, um hetta verk fast í lag. Og Víkarmenn bjóða sær eisini til at arbeiða nakað ekstra. Interessan er altso stór. Teinkimátiu er, at hetta anuleggið verður gjort fyrst og síðani útvíða tá lagaligari prístur verður á jarni og timbri. Tingsins álitismaður heldur, at tað ikki vil blíva so ógviliga dýrt forholdsvís. Heudan sak gongur okkum ógviliga nar. Tað er gott kyrcuplass í Vík, men ringt at koma á land serliga við tað, at har er so stórur munur á flóð og fjørn. Tingsins kassar eru ikki illa staddir av tí, sum latið er til Víkar; men vit hava heldur ikki biðið um nakað herfyri. Eg vil anbefalla uppskotið frá minnitalinum og biðja fleirtalið at taka sítt uppskot aftur.

M. A. Winther: Eg eri samsintur við A. Samuelsen, at vit ikki gera ovmikið fyri lendiplass. Men tað er okkum ógjorligt til hvørja tíð at kunna játta hvørjum einstokum bonarbrævi. Hettar bonarbrævið er ikki órímiligt. Tí eitt forstandarskap kemur ikki inn við einum bonarbrævi, hvar tað leggur so stórar byrðar á seg sjálvt, uttan at eitt virkuligt krav er aftanfyri. Tó eru viðurskiftini so, at hendan fyritokan ikki kann fremjast hesa ferð. Ikki tí: Sakin er góð. Men hvussu nógvar sakir eru ikki nú útsettar. Og Vík er tó ikki, sum alt er sagt, kyrcuvond pláss. Men tað er sjálvandi, at Vík má hjálpast, tí har er ringt fyri motorbátar at leggja at. Eg skal lova tingmanninum í Norðstreymoy, at tá og siggi, at tað vera líkindi til at hjálpa hesum málinum, tá vil og vera við. Lat okkum siggja um vit til næsta ár kunnu gera meir. Vit eru í evgablikkinum á eini so óvissari stoðu. Iðin ting at siga aftrat er, at Víkarmenn tóku verkið fult út og so soktu stabin um studning, tí um hetta verk skal gerast til fulnar, so verður tað dýrt. Tí hetta er væl hert ein begynningur til meiri seinni. Nú hava bádir partar sett sítt sýn fram, og vit eru samsintir í tí almenniligu skoðan á hetta verk. Men og kann ikki broytta mítt ynski til 3. viðgerð á hesi sok.

M. Samuelsen: Tí ordførarin sigur, at Vík ikki er ringt lendiplass, so er tað satt. Vit kunnu rógva út, um vit ikki fúna

hesa brúgv. Men her er ringt at leggja á landi og til at fáa fiskin upp. So er tað tað aftrat, at ørðforarin tykist at forútseta, at hetta ið gerst nú, er smáting ímóti, hvat ið má gerast aftrat. Eg forstóð tillidsmannin umvent: at hetta var hin meiri partur, og hitt hin minni. Hetta verður ein hjálp fyri okkum, um tað verður gjort. Hann sigir, at vatnstandurin har var 1 m á minsta fjora. Táið so verður bygt heilt lítið aftrat kunnu sjálvt teir størstu motorbátar flóta at, og fáa vit hetta anlegg í stand, verður hitt ikki so kostbart. Eitt er ringt: grót er ikki at fáa í nærheitini, so Víkarmenn leggja eitt stórt arbeiði á seg við at søkja um hetta, umframt at teir leggja eina stóra byrði á seg. Men hetta má gerast, og um so verður, at tingið sleppur teimum upp á fjall, so má kortini nakað gerast, og fáa teir onga hjálp, mega teir líta á seg sjálvan.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Ørðforarin (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum í sak nr. 7, lendistað við Gjógv, og mælti til at geva studning.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Ørðforarin (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum í sak nr. 8, lendistað í Norðadali og mælti til at útseta hana til næsta ár.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Ørðforarin (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum í sak nr. 9, lendistað í Húsavík og framhelt, at Húsavík er av verstu brimplássum, so tað var eyðvitað, at tingið máttti hjálpa teimum, men við tað, at har er ein lendistað frammanundan, verða teir at bíða til næsta ár.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Ørðforarin (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum í sak nr. 10, lendistað í Lorvík, og segði umframt: Teir siga, at kostnaðurin ætlast at verða o. u. 10,000 kr. Men her fyriliggur einki yvirslag ella yvirhovur nokur eklering, um ikki upplýsingar frá forstandarskapinum. Um tað skal vera materialier fyri 10,000 kr., so verður hetta ógvuliga nógv fyri løgtingið. Lorvík er eitt pláss, hvar tað er ringt at lenda, og tað er millum tey, sum mann vil royna at fáa gjort eina fiskarihavn fyri. og tingið eigir yvirhovur altið at taka væl undir einari umsókn úr einum sovorðnum plássi. Men táið teir í ár sokja um so nógvan pening, og sakin er so lítið upplýst, so noydast vit at svara, at tingið kann einki gera við hetta í ár.

A. Samuelsen: Vit eru allir samsintir í, at sakin ikki kann fremjast, sum hon er í evgablikkinum, og eg skal bert geva upplýsingar um einí tvey punktir í henni. Ørðforarin meinti, at tá har var nevndur ein kostnaður uppá 10,000 kr., so var hetta bert ætlað uppá gjot; men tað er ikki beint. Monnirnir hava tosað við tillidsmannin, tí hann ferðaðist forbi har, og hann hevir hugt at støðini og sagt teimum sum sína ætlan, at tað verður um 10,000 kr. Tað er sjálvsagt ikki heilt nojaktigt, men tó soleiðis, at tað kann roknast við tí. Tví eingin upplýsing er frá forstandarskapinum, er tí, at sakin kom av seint, og segði við teir, at hon kom aftaná tann normala freist, og at tað tí ikki nýttist nakað fylgibrøv. Eg meini, at vit skuhu halda uppá lann tíðarfreist vit eina ferð hava sett fyri innlovering av umsóknum til tingið. Tað er av allarstørsta týdningi at gera nakað í Lorvík við lendistøðina, og eg eri ikki í iva um, at forstandarskapið vil halda tað viðlíka, sum tingið setur í verk. Táið ikki hevir verið sokt um hetta fyrr, er tað tí Lorvík fyrr hevir verið saman við einari aðrari kommunu; nú eru teir komnir fyri seg sjálvar, og nú ber teim betri til at fara undir eina slíka fyritoku. Umframt tað, at tað treingir til, at nakað verður gjort í Lorvík við lendistøðina, so eiga vit at minnast, at í tí bygdini liva næstan allir menn av sjónum, og tað er vanskuligt at finna eitt pláss í Føroyum, hvar tað búgva fleiri útróðrarmenn. Eg ivist ikki í, at løgtingið tí sína tíð vil stýðja hetta. Um hetta ber at kosta nógv meir enn tilætlað, kunnu vit jú ganga tann veg, vit plaga við stórri anleggum og sokja statin um studning.

Ørðforarin (M. A. Winther): Ja, álitismaðurin hevir áttalað seg um kostnaðin, men hetta eftir einari leysari ætlan. Vit vilja óivað allir her á tingi taka undir, hvat A. Samuelsen segði um Lorvikingar. Teir eru víða kendir sum útróðrarmenn, og tann, ið hevir verið í Lorvík, má beinanvegin fáa fatan á dugnaskap. Eg vildi vunskt, at teir kundu sett hetta fram soleiðis, at

tað varð so umfatandi, at vit kundu biðið statin um skudning. Vit vilja óivað allir gera okkara besta fyri hesa sak.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Orðføraria (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum í sak nr. 11, lendistoð í Góðadali.

A. Samuelsen: Sum orðføraria segði hava vit stillað eitt minnitalsforslag í hesi sak. Hesini tað gongur út uppá, at sakin verður útsett til næsta ár til endiligt avgerilsi, men fyri so vítt sum andragararnir hava gjørt arbeiðið liðugt á forsvarligan máta innan Ólavsøkudag n. á. fyrisláa vit, at tingið letur teir fáa tað vanliga til skotið av økonomisk fond, upp til 400 kr. Tað er já neinliga so, at verður hetta ikki gjørt um várið ella móti summri, so verður tað ikki gjørt; skal tað bíða til Ólavsøku n. á., so verður einki gjørt fyrrenn uppaftur annað ár. Vit hava bíðað soleingi við hesum, tí vit hildu, at sakin toldi at bíða eitt ár, men høvdu vit vita at allir prísir framdeilis skuldu fara og bækka sum teir hava gjørt, so høvdu vit bevilgað hetta tilskotið tað árið ístaðinfyri at útseta sakina. Vit hopaðu tá, at kríggið skjótt fór at halda uppat og alt so skuldi fara og batna, men tað var ikki, og nú tora vit ikki vænta, at teir fyrrverandi prísir skulu koma aftur í eini nærmari framtíð. Tó vilja vit lata andragararnar fáa, um eg so má siga, eina schancc, í tí vit siga við teir: Vit tilsiga tykkum tað vanliga tilskot aftur tí fyriliggjandi yvirslag, viss tit útføra anleggið í komandi ári, so tað er liðugt áðrenn Ólavsøkudag 1920. Tað er so lítil munur millum okkara forslag og fleirtalsforslagið, at eg haldi, teir gott kunnu tilráða at stemma fyri okkara forslag. Plássið har norði hevur stóran týdning, ikki bara tí, sum orðføraria vísti á, at fuglfirðingar har skera sítt mesta torv, men tað er eitt vandafullt pláss. Her hondi soleiðis nokur ár herfyri ein syndarlig ólukka, í tí at ein motorbátur umkomst; har doyðu bæði mannfólk og komufólk. Eg meini vit eiga at gera, hvat gerast kann til at bøta um hesa lendistoð, og hópi tí, at vit við 3. viðgerð kunnu einast um at stemma fyri okkara uppskoti. Tað er, sum orðføraria sogði, eingin útsikt til at cementprísirnir fara at falla snarliga — og løgtingið er forvitin interesserað í øðrum sokum, sum geva tinginum allan umleiðing til at hopa, at fraktirnar ikki fara at falla stórt.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Umsóknir frá Foroya skipara- og navigatorfelag.

3. viðgerð.

Orðføraria (R. Rasmussen) greiddi frá nevndaruppskotinum.

A. Samuelsen: Viðvíkjandi motorbátum hava J. Rasmussen og eg tikið serstoðu, og vilja alvorliga fraráða, at nøkur fyritekur nakað viðvíkjandi teimum. Um tað verður samtykt sum Debess og R. Rasmussen fyrisláa, vil tað leggja stórt hand á okkara fiskiskap. Forslagið frá Mortenson er óneydugt. Motorbátaførarar kunnu fáa undirvísing um teir vilja. Vit nýta onga lóg um tað. Eg veit ikki, um skiparafelagið forstandur viðurskiftini rætt um hvussu mangar vanskiligheitir teir koma at bereiða plássum, sum hava stóra motorbátadrift. Hesin spurningur er reistur av nøkrum, sum eru heimaskiparar. Teir kunnu vera góðir til sítt brúk, men hava ikki fult kentskap í hesum, og eg haldi ikki, at nøkur skal fylgja teimum.

N. Debess: Tá sakin var til 2. viðgerð, greiddi eg mína støðu viðvíkjandi motorbátum. Tá eg havi gingið við til at styðja uppskotið, so er tað tí eg meini, at tað ikki vil hava ávirkan á nakað, sum er til skaða.

J. Rasmussen: Eg haldi, at hetta vil virka hemmandi uppá fiskiskapin og gera tað at driftigir og góðir útróðrarmenn verða avskornir frá at verða formenn á motorbátum. Mær tykir, at nøkur her eisini skal spyrja fiskimennirnar og motorbátaeigararnar, hvat teir halda. Eg vil anbefalla, at nøkur ikki stemmar fyri hesum uppskoti.

A. Samuelsen: Tað er sjálvsagt, at Debess stillar uppskot frá sínum sjónarmiði. Men tað kann vera, at Debess ikki er so væl inni í hesum viðurskiftum. Tað drívast væl motorbátaútróðrir í Havn men ikki so nógv, sum nøkur onnur staðnis. Hansara

uppfatilsi svarar ikki til tað, sum eg havi frá plássum har tann storsti motorbátaútróður er.

N. Debess: Eg komi til Havnina, og havi eisini talað við menn úr plássum har motorbátaskiskapur drívnst í stórum. Eftir teirra upplýsingum hava motorbátaforarnir longu uppfylt hesar treytir við tað, at teir eru navigatorar. Og so er væl eiki at frykta fyri, at hetta skal virka skaðiligt. Hetta betýðir bert eina storri trygd.

A. Samuelsen: Eg seti mína erfaring móti Debess. Eg veit nógvar bátaforarar, sum ikki eru navigatorar. Her í Havn eru teir tað kannske, men eg trúgvi ikki, at teir fakttaka betri motorbátareglurnar enn teir, sum eru góðir sjómenn. Óheld hava hent líka ofta har sum navigatorar hava verið umborð, sum tá ikki navigatorar hava verið — kanuske oftari.

J. Rasmussen: Man royndir at fáa dyktigar menn til báturnar. Tað er betryggjandi nokk.

N. Debess: Tað síðsta sum A. Samuelsen framfordi, er ov veikt til, at eg vil broyta mína støðu.

A. Samuelsen: Tað síðsta, og segði, var satt.

N. Debess: So kanuske tað er farligt at hava navigatorar umborð.

A. Samuelsen: Um Debess heldur tað, so er tað kanuske so.

N. Debess: So haldi eg, at A. Samuelsens uppskot skuldi ljóða annarleiðis.

A. Samuelsen: Vit hava eiki uppskot.

Av nevndaruppskotinum varð samtykt:
I. A. og B. og II.
III. varð ikki samtykt.

Fundur mánadag 15. september.

Uppskot fra formanninum um fundir fyrrapartin av degi.

Formaðurin: Paa Grund af, at den sædvanlige Tid er gaaet for Tingsamlingens Varighed vil jeg gerne sporge Ordførerne, om der er noget i Vejen for at begynde paa Formiddagsmøder.

M. A. Winther: Eg eri formaður í trimum útvalgum. Í telefonsakini kemur eiki forslag aftrat. Í liggjarnevndini kann pálíkuingarin verða lidugur við tað allarfyrsta. Epidemi-, karantena- og tuberkulløgirnar verða allar útsettar. So er ein sak: Hospitalssakin, sum ikki er liðug, men hon kann koma nakað skjótt. Útvalgið fer her at halda somu støðu, sum ífjor, av tí at sakin hevur ein nakað líknandi karakter. Fyri mítt viðkomandi er eiki í vegin fyri, at tingið kann slutta í hesi vikuni.

J. H. Poulsen: Tað stendur kanuska mest á tí útvalgi, eg tíverri eri blivin ordførari fyri. Har er nakað nógv eftir: Lógirnar um sala av prestagørðum og friðing av troðum, betonkningur um lon til djóralæknan og landbrúkskonsulentin. Betonkningurin er nokk liðugur, men lógforslagini krevja lougri behandling. Tíverri fæst eiki trykt, eg havi spurt bæði hjá »Tingakrossi« og »Dimmalættingi«; vit noyðast at láta tey skrivað, men tað kann knípa við at fáa sonógv exemplarir at tað verður eitt til hvonn tingmann. So er ein sak aftrat frá Havnar býráð: Vegurin Havn-Velbastað-Kirkjubø, hvar talan hevur verið um at fyritaka eina nýggja gjogngumrokning. Ingeniørurin hevur lovað at gjørt betra arbeiði so skjótt, sum hann kundi, og er sakin fyrst liðug frá honum, so kann hon skjótt verða expederað.

S. P. á Kongi: Eg eri ordførari í tí kommunala útvalginum; har eru 3 sakir eftir. Av rokniskapunum eru fleiri gjogngingin, men nokur eru ikki komin frá revisor. Ein sak er ongan veg komin: Londoðkan til jarðarmoðurnar. Her stendur tað um at forandra lonsatsirnar, men eg antaki, at tað ikki fer at taka so langa tíð. Eg siggi, at ordførarin í kirkjuksaknevndini ikki er tilstaddur og skal tí siga frá, at har eru allar skúlasakirnar eftir. So er

oin nýggj sok um latínskúla og lon til lærarar, men tær taka rímiligt ikki nógva tíð.

R. Nielsen: Av teim sokum, eg havi við at gera, eru tær 3: tilskot til doktarar á Íði, Sandi og í Vágum, farnar til 2. viðgerð. Honda fyrsta verður liðug í lopi av degnum, men hin fjórða: doktari í Fuglafirði er ikki komin enn.

N. Debess: Eg eri orðførari í eini nevnd: Sanatoriinevndini. Nevndarálitið fer til avskrivningar í dag.

O. Effersøe: Formanden i Udvalget om Elektricitetssagen er ikke til Stede, men her er det nok saa, at man i Øjeblikket lægger den sidste Haand paa den sidste Betænkning; det drejer sig saa om Afskrifter, med Trykningen er det nok saa vanskeligt. Udvalget er her i samme Situation som de andre Udvalg.

I øvrigt finder jeg Anledning til at udtale, at Spørgsmaalet om, at Samlingen ikke maa trækkes for længe ud, ikke er et Spørgsmaal om Diæter, om den skulde koste lidt mer eller mindre, ejheller et Spørgsmaal for de enkelte Medlemmer, at de kan komme hjem. Spørgsmaalet er af stor Betydning for hele Samfundet: at Lagtingssamlingerne ikke forlænges saaledes, at det kommer til at knibe for de dygtige Kræfter, der findes paa Øerne, at overtage Hvervet som Lagtingsmand. I de senere Aar har vi sat os som Maal at være færdige i Løbet af 6 Uger, og det vilde være heldigt, om vi i Fremtiden vilde tilstræbe det samme. Vi maa nu søge at indstille Arbejdet saaledes, at vi absolut kan blive færdige i denne Uge; er der Sager, der ikke kan komme med, maa de vente til næste Aar. Til disse mener jeg, at Jordemoderlommingerne bør henregnes. For Udvalgene er Jærdige, kan det ikke nytte at begynde med at holde Møder 2 Gange om Dagen, saa bliver der slet ingen Tid til Udvalgsarbejde.

M. A. Winther: Eg hugsi, vit allir kunnu undirskriva tað, sum Effersøe her hevur sagt. Og eg hugsi eisini Effersøe vil indrømma mær tað, at eitt sum norvan og hevur norvað okkum mest, er at vit hava so svárt við at fáa begynt. Eg havi sitið her á tingi í 16 ár, og tað hevur gentikið seg hvort ár. Eg royndi iljor at verða tíðliga líðugur, og eg hevði eisini altar mínar betænkningar, 40 hugsi eg tær vóru, avgivnar áðrenn august mánaði var útgingin. Men tað knípir so ofta við at fáa fimirnar samlaðar til útvalgsmoltu og á tann hátt kann eitt útvalg so leitt koma at forða hinum. Fyri tingið sjálvt hevur tað nógv at týða, at líðin verður so stutt sum møguligt uttan at vit luta tað ganga útyvir sakirnar og teirra viðgerð. Fyri smásakirnar er einki í vegin at begynna við morgunmotum, tær kunnu saktans bliva expederaðar. Tað er ein ting, vit mugu minnast: tær stóru sakirnar taka teir stóru debattirnar og ein kann ikki forlanga, at tingmenn, tá teir hava diskuterað einar 5—6 tímar skulu vera lúsir at fara í útvalgsmoti.

O. Effersøe: Jeg vil ikke komme ind paa nogen Diskussion om, hvorvidt Lagtinget i Aar har fremmet Arbejdet tidligere eller senere end før. Derved vilde jeg kun forlænge Tiden. Jeg vil blot tillade mig at gøre opmærksom paa en formentlig Fejl, den nemlig, at Udvalgsmøderne ikke, som tidligere holdes Kl. 10 om Morgenen. Det er i denne Samling gaaet ret smaat, tiltrods for, at vi i en Hensende har været heldige, nemlig med Grindeforstyrrelser.

Formaðurin: Jeg forstaar dn ærede Talere saaledes, at for om et Par Dage kan der ikke være Tale om Morgenmøder.

Hækkan av lon til roknskapargranskara.

2. viðgerð.

Oðforarin (M. A. Winther): greiddi frá uppskotinum og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerð.

H. C. H. Jørgensen: Tá tað fyriliggur uppskot um hækking av revisorlon innanfyri eitt bestemt umráði viðvíkjandi tingsinum, vil og spyrja um tann ikki hevur hugsað at hækka lønina fyri kassereraranum við allar lagtingskassarnar. Hesar lønir eru settar fyri 30—40 árum síðani og kunnu ikki hóska nú. Eg vil biðja nevndina at hugsa um hetta.

M. A. Winther: Tað kundi vera rímiligt. Tað er fastsett bestemt løn fyri hvønn tingstakan kassserara, og tann mátti tá eisini hækka lønina fyri hvønn av hinum. Sjálvt um einki uppskot kemur nu hetta í ár, so eiga vit at hava tað í huga til næsta ár. Tí er tað so — jalfall viðkomandi

nakrar løgtingskassar — at reknskapsfararnir fyri utan teirra fasta gottgerilsi fáa eitt sindur aftrat fyri leveranoer alla tílíkt.

O. Effersøe: Der er nogle Kasser, som er samlet under en Kasserer, men det vilde være heldigt, om samtlige Lagtingets Kasser sorterede under en Kasserer. Den Betaling, som betales til Lagtingets Kassorer, nemlig 600 Kr., er for lidt. Det kan Tinget ikke komme uden om. Vi kan jo risikere, at vi en skønne Dag staar uden Kasserer. Vi maa sætte Betalingen op til et rimeligt Beløb. Med Hensyn til Forsikringsforeningen for Skolebygninger er vist Betalingen tilstrækkelig. Jeg vil anbefale, at denne Sag tages op og løses saa hurtigt som mulig.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Víðkan av telefonnetinum.

2. viðgerð.

Orðføraria (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerðar.

J. M. Hatras: Hetta hjálpir einki uppá hini plássini, ið nú líða uppá at fáa telefon, hvat ið teim viðvíkir, eru vit ikki komin nærri, at vit hava fingið lyfti frá útvalgsformanninum um, at hann ger, hvat hann kann fyri hesum næsta ár. Eg minnist, at eg las í einum norskum blaði, at orðhaldni er ikki so høgt í kurs nú sum áðrenn kríggið; eg hopi ikki, at hetta er smittað til Føroya, og táið formaðurin hevur lovað næsta ár at royna, hvat hann kann, so vænti eg eisini, at hann gor tað. Vit høvdu nú um dagirnar eina aðra sak frammi, um jarðamóður; har er tað soleiðis í Norðuroyggjum, at har er eingin jarðamóðir í Kunoy, og í Kalsoynni er eingin útan á Húsum, men har er eingin telefon. Kundi tað nú ikki fingist í lag at fingið ein enda skoyttan uppi telefonina av Syðradali til Húsar; so kundi Kunoyingar altíð telefonera eftir jarðamóðurini, tá tað nýttist. Eg vóni, at formaðurin, sum hann hevur lovað, vil gera, hvat hann kann fyri, at næsta ár verður tikið alvárliga fatt.

M. A. Winther: Hvat ið tí viðvíkir at leggja ein enda til Húsar, so eru vit noydd at lata vera, tí vit hava beinan vegin einki tilfar. Vit kunnu ikki keypa hert einar 50 steyrar niðrifrá: táið vit fara at keypa, má tað vera so nógv í sem, at vit kunnu frakta eitt passaligt skip higar við tilfarinum, annars verður tað ov dýrt; at taka tað upp við rutubátunum í sínámu, kann á ongan hátt loysa seg. Og vit hava ikki í øllum Føroyum so mangar steyrar til yvirs, at vit kunnu fáa lagt telefon til Húsar. Vit hava heldur ongan tráð: tað er ikki komin tráður til landsins undir øllum krígnum, og apparatir hava vit t. d. ikki fingið í 1½ ár. So tað má takast útyvir, at vit ikki leggja hesa telefonu, vit kunnu ikki, tí vit hava einki tilfar.

R. Rasmussen: Táið spurningurin um at hæðka telefongjaldið var fyri, varð av fleiri fingmonnum hildið fram um tað hóskandi í at nýta tráðleysa telefon í Føroyum: og haldi tað hoyrir meira heima undir hesi sak. Her hevir í dag verið talað um telefonsamband við Mikines, Svínoy og Fugloy; og so vítt eg skilti orðføraran, helt hann tað fyri fyrst vera ómuguligt at leggja kadal um hesar firðir. Vit hava eisini hvað at hugsa um telefon til Suðuroynar av somu grund. Har hava vit fingið tráðleysan telegraf í staðin, tað botir eitt sindur um hetta sama, men kann kortini langt frá gera somu nyttu sum telefon. Tað hevir verið hildið fram her á tingi, at hesar oyggjar máttu kunna fingist í samband við hinar við tráðleysari telefon. Tað er ikki gott hjá einum ikki fagmanni at úttala seg um hesa sak, men eg havi roynt at fingið meir sakkonar upplýsingar, og eftir teimum tykist hin tráðleysa telefonin nú at vera heilt nýtilig í øllum viðurskiftum, við tað, at hon kann setast í samband við almenna telefon. Tær teknisku vanskeligheitir tykjast at vera burturtiknar, og serliga hevir hin tráðleysa telefon gjort stórt framstig undir veraldarbardagamum. Í tveimum londum serliga er hon komin til fulla nýtslu: í Amerika og Englandi. Men har tykjast at vera stórar ekonomiskar vanskeligheitir. At seta hetta í verk, er so ovurhonds dýrt, at tað illa kann loysa seg, utan í heilt stórum stíli. Eftir tí og veit, eru ongar teknisk vanskeligheitir fyri tráðleysa telefon millum oyggjanna her, men tær ekonomisku útreiðslur til anleggini verða so stórar, at tað ikki er hugsandi um, at hetta kann gerast í einari nærari framtíð. Tað er nakað vónleyst í hesum, men kortini kann

eingin roða. Tað, at patentini eru í hondini á einum kapitalsterkum firmaið, ið ikki kann konkurrerast burtur, vil gera tað ómøguligt fyri fyrst at fáa hesi arbeiði gjørd bílig. Eisini er tað so, at avsendarastøðurnar eru ógvuliga dýrar, meðan móttokustøðurnar eru heilt bíligar, so biligar og einfaldar, at ein kann ganga við teimum uppi á sær. Vit gera rættast í, ikki at vænta okkum ov nógv av tráðleysari telefon fyri fyrst, og ikki ugga Suðuroyingar, Fugloyingar, Svínoyingar og Mikinesmenn við, at teir kunnu kanska fáa tráðleysa telefon, tí enn eru ikki møguligheitirnar til steðar.

M. Samuelsen: Táið vit hevdu heldkan av telefontaxtunum til viðgerðar, hevði eg upp á mál at dublera linjuna Vestmanna-Fuglafjørð av hensyn til tey pláss norður hjá okkum, sum nú onga telefon hava, Saxun, Tjørnuvík og Langasand, tí um hesar linjur sunnanfyrri verða avlastaðar nakað, so kann vera vón um, at vit kunnu fáa telefon til hesi pláss. Eg vil biðja ordføraran siga mær, um hann vil svara fyri, at tað ikki vil skaða Saxun, Tjørnuvík og Langasandi, at handa linjan ikki verður dublerað, tí so vil eg stemma fyri uppskotinum, annars ikki. Eg komi ikki her fram við broytingar uppskoti, tí eg haldi tað vera orkeslyst. Men eg líti so nógv á ordføraran, at um hann vil svara mær fyri hesum, vil eg stemma fyri uppskotinum.

M. A. Winther: Ja, tað hugsi og kann svara ganska bestemt fyri, at tað ikki verður til skaða fyri taer nevndu bygdir. Vit hjálpa bygdunum norðanfyri á Streymoynni og Eysturoynni bæði við at dublera sum vit nú fyrísláa linjuna Tórshavn—Vestmanna og Tórshavn — Fuglafjørð — Lorvík, og við at dublera sum M. Samuelsen fyrisitar linjuna Vestmanna-Fuglafjørðar. Tann dubleringin vil eisini eina ferð koma. Saxun, Tjørnuvík og Langasand vilja ikki vera telefonstøður, ið koma at leggja so nógv beslag uppá linjuna, at tað kann koma til at forða. Tað eru onnur støð, hvar viðurskiftini eru ikki betur, táið talan verður um dubleringar, t. d. suðuri á Sandoy eru ógvuliga nógvar støður á linjuni Skálavík, Húsavík, Skarvanes, Sand, Skopun, Hestur, Kirkjubo — har treingir harðliga til dublering, men tað eru minni bygdir og hesi verk vil hava fyrisligið at gera í ár, mega ganga fram um.

Poul Nielasen: Eg skal bert siga nakur fáa orð til R. Rasmussen. Hann mainti, at vit ikki áttu at stilla okkum ov optimistisk yvirfyri hini tráðleysu telefon, og at tað vildu vera stórar økonomiskar vanskiligheitir við at fáa hetta í lag. Eg eri ikki fagmaður í hesum, men kann bert siga, hvat eg havi hoyrt og lisið í bløðum, og eftir tí er tað ikki neyðugt at gera stórar telefonstøður til almenna nýtslu; tað verður sjálvandi neyðugt, táið talan er um telefonering millum Amerika og England. Sjálvsagt vilja teir núverandi patentinnihavarar, Marconiselskapið í London, ikki lata hetta patent frá sær bíliga so leingi teir eru einsamallir um tað. Eg dugi ikki at síggja nakað skeivt í tí, um tann standandi telefonnevndin kannar eftir, um nakað kann gerast við hesum, tað kann ikki kosta stórt at fáa tað upplýst, og eg haldi, at tað er nakað, nevndin eigur at gera.

O. Effersøe: Med Hensyn til Bekostningen ved et traadløst Telefonanlæg, da kan jeg oplyse, at i sin Tid tilbød Valdemar Poulsen-Selskabet at etablere traadløs Telefonforbindelse mellem Thorshavn og Suderø for 40,000 Kr. Heri var, saa vidt jeg erindrer, ikke iberegnet Station. Dette tyder ikke paa, at der skulde være saerlig stor Bekostning ved et saadant Anlæg, og det er jo flere Aar siden, saa det maa være blevet billigere siden den Tid.

R. Rasmussen: Eg veit ikki, hvaðanni Poul Nielasen hevir sínar upplýsingar; um tað er úr avísum, so eru teir sjaldan heilt góðar at ganga eftir í slíkum málum, tí teirra frásagnir eru so ofta forhastaðar. Taer upplýsingar, eg her havi givið, eru úr elektroteknisk Tidsskrift, og tað skuldi verið nóg so álitandi í einum slíkum máli.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Tingmannalonin.

3. viðgerð.

M. A. Winther: Eg skal mæla til, at uppskotið verður samtykt.

Uppskotið varð samtykt.

Havnabygging.

3. viðgerð.

Ordføraríu (J. H. Poulsen): Eg skal mæla til, at tingið samtykkir nevndaruppskotið.

Uppskotið varð samtykt.

Stuðningar til brýr.

2. viðgerð.

Ordføraríu (M. A. Winther): Eg hugsi, at eg í hesum máli kann halda meg til fuy áttalilsi, eg framfordi við 3. viðgerð av lendistoðunum. Vit hava í teim seinastu árum ongar inntokur haft til ekonomisk fond, við tað, at hvalatollurin sum í nokur ár gav o. u. 20,000 kr. árliga, nú hevir verið eingin, og tingið hevir tí í teim seinastu árum ikki givið stuðning til lendistoðir og brýr. Vit hava ikki viljað lagt hesar útreiðslur á amtsrepartitiónsfondina, og hinir peningar í ekonomisk fond eru allir bundnir til ávísar útreiðslur.

Fleirtalið meinti at koma útyvir vanskuligheitirnar við at framseta tað skattalógforslagið, sum tíverri ikki bleiv gjognumfort. Vit hava roynt, hvat vit kundu fyri at fáa eina so góða forvaltoning av hesum peningasakum sum moguligt og ikki at fyritaka nakrau heimild utan hann var av hagstu nevðvendigheit. Vit hava sett okkum til mál ikki at pínora kassanum nakað undirskot, sum kundi ongantast.

1. Brúgv um »Gjógvará« í Vestmannahavn.

Ordføraríu greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at samtykkja nevndaruppskotið.

II. Brúgv um »Breiðá« á Válinum.

Ordføraríu greiddi frá nevndarálitinum og mælti til samtyktar.

J. Olsen: Tá ordføraríu talar um, at hendu áin er soleiðis, at hon tornar upp um sumarið og ikki er víðari stór um veturin, so er hetta ikki rætt. Hon tornar ongantíð upp og tá áarfori er, eru Válanesin heilt avskornir frá at koma tvortur um. Eg vildi ógviliga fegin, at teir kundu fingið hetta tilskot, men — har einki er, har tekst einki.

III. Brúgv um »Matará« á Skarvanesi.

Ordføraríu greiddi frá nevndarálitinum og mælti til samtyktar.

IV. Brúgv um »Stóra« í Funningi.

Ordføraríu greiddi frá nevndarálitinum og mælti til samtyktar.

V. Brúgv um »Kluftá« í Vík.

Ordføraríu greiddi frá nevndarálitinum. Viss minnitalið vil framseta forslag um, at bevillingurin frá 1915 verður uppafturtikin, so vil eg stemma fyri tí, men hetta uppskotið kann eg ikki ganga við til. Tað er av stór byrða at leggja á tingi í ár. Eg vil anbefala fleirtalsins forslag.

Men hendu brúgvin verður av dýr at hebyrða ekonomisk fond við. Hann átti nærtan heldur at gera brúgvina við jarnskinnarum, í bráðfengi; tað er nógv biligari.

O. Effersøe: Mindretallet har ment, at denne Sag ikke burde vises bort i Aar. Dette er ogsaa erkendt fra Flertalsordføreren. Han har udkastet Tanken, om man ikke kunde forhøje Bevillingen. Hvorvidt dette er en Løsning, ved jeg ikke. Vi har stillet Forslag om, at Broen skal være af Sten. Det gælder et større Beløb. Men engang maa man til det. Naar man bygger Broen af Sten, gaar der ikke saa meget Cement til. Vort Forslag gaar ud paa 2000 Kroner.

M. Samuelsen: Tí forstandarskapið í Vík aftur í ár kemur og biður tingið um tilskot til hesa brúgv, so er atvoldin tann, at brúgvin er so ring, at mann ikki kann forsvara hana longur. Vit hava hjálpt uppá hana, men nú vil forstandarskapið ikki forsvara hana longur. Tá bonarbrævið var inni á tingi í 1914, tá gall tað eina steinbrúgv. Síðani var hildið, at tað skuldi vera jarnbrúgv, men tingsins álitismenn hildu tað vera ómuguligt at gera jarnbrúgv fá. Men lyggjarmennirnir eru ikki tilfreds við, at tað verður gingið frá gróti

til jarn. Ingeniorurin raður ikki til at gera brúmna av jarnskinnarum við tað, at brúgvin ikki kemur at vara. Nú er brúgvin so rotin, at forstandarskapið ikki vil forsvara at halda hana. Vit koma tí við andragandi um steinbrúgv, soleiðis sum í fyrstuni var gjort. Vit hava bott uppá brúmna, men vit orka ikki longur at gera tað. Tað er illa statt við peninginum í økonomisk fond. Men her er ein brúgv, sum er heilt avfeldug. Tað er nógv imillum eina brúgv sum liggur langt frá húsum og fátt fólk ferðast um, enn eina brúgv sum hosa, sum liggur inni í bygdini og nógv verður brúkt. Tað kann vera nógv fyri hjá tinginum at fremja eitt verk burtur úr øllum hinum. Men so illa stendur engin brúgv fyri sum henda. Og vit hava kanske eitt sindur størri krav enn aðrir. Vit vóru einir teir fyrstu at taka vegir, tá vegsakin kom framm. Og eg vil halda, at brúgvar og vegir hoyra saman. Men vit søktu at fáa stuðning til vegir, og fingu einki. Hetta átti tingið at hava eitt sindur í huga. Eg vil framhalda, at okkara brúgv treingir harðast til bót av øllum brúgvum, og eg vil tí anbefalla nimitalsuppskotið.

M. A. Winther: M. Samuelsen kann ikki taka við mínum uppskoti. Eg vil tó biðja hann hugsa um tað til 3. viðgerð. Tað er so, at um man ikki fær tað besta, man ynskir, so kann man fáa tað næstbesta. Eg vil aldeilis ikki avvísa hetta málið. Um økonomisk fond skuldi fingið inntøkur av hvalaveiðu til næsta summar, so vilja vit koma hesa brúgv í huga.

M. Samuelsen: Eg vil spyrja orðføraran, hvor ið skal taka ansvarið um brúgvin brotnar undan fólki. Vil tingið taka ansvarið.

A. Samuelsen: Tað er ikki forsvarligt at lata brúmna í Vík vera sum hon er. Aftur má tingið hjálpa ella gova forstandarskapinum pálegg um at taka sær av brúmi. Hetta er ein brúgv, sum man ber lík eftir. Seinast eg var við til líkferð í Vík, hevði eg tað inntrykk, at brúgvin fór at brotna. Hetta hevur verið grundin hjá mær til at framseta broytingaruppskot.

M. A. Winther: Tað fyriliggur einki frá sýslumanninum í Norðstreymoy um hesa brúgv. Hann er jú ein forur maður og hann ábti at hava givið gætur eftir um brúgvin dandaði, tá hann hevur gingið um hana. Ein brúgv av jarnskinnarum er góð og bílig. Tað sum fyrr er játtað til brúnna, er 470 kr.; vit kundu nú givið nakað aftrat, so tað vóru 6—700 kr. So fanst brúgvin gjørd. Ofta koma menn við søkum inn á ting og siga, at tað er aldeilis neyðugt, at hatta og hatta verður gjort, og at tingið nú geva stuðning. Vit hava nakrar tílíkar brúgvasakir liggjandi her, sum enn ikki eru framdar. Men tey verk, sum her umhandlast, brúkast tó enn. Hví lótu Víkarmenn ikki arbeiðið gera í 1915, tá tingið hevði játtað stuðning? Teir kundu latið brúnna gjørt fyri tann bevillingin. Eg vil vera villigur at bekrefta tann bevillingin og enntá hækka hann.

A. Samuelsen: Winther segði, at nú brúgvin dettur niður, so má hon gerast upp aftur. Um og var vissur í, at hetta hendi útan folkaskaða, skuldi eg við fornøjilsi avvænta tað tíðarpunktið. Tað er trúligt, at brúgvin brotnar, meðan serlig vekt er á henni. Mann kann ikki koma til kirkju utan at fara um hesa brúnna. Winther spyr, hví ikki Víkarmenn gjørdu brúnna í sínni tíð. Um teir vistu, at forholdini versnaðu so illa, so hevdu teir gjørt tað. Men teir hopaðu uppá betring, soleiðis sum tingið nú ofta hevur gjørt, og sum teir eisini úti í øðrum londum hava gjørt. Men betringur er engin komin. Men tað kundi vera natúrligt, at teir biðaðu, og tá hon ikki var gjord tað fyrsta árið, so kundi hon ikki vera gjord seinni, tí jarnskinnarar vóru ikki at fáa. Víkarmenn hava biðað, tí teir hava trúð, at oin givin bevillingur stóð við makt, men fáa teir ikki tilfar til jarnskinnarabrúnna, so eru teir líka nær. Cement kann nú fáast, men tað er dýrt. Fyri so vítt man ikki kann fáa lov at gera steinbrúnna, so má nakað annað gerast, og tað skuldi so verið tað næstbesta, jarnskinnarabrúgvin, men higartil hevir einki tilfar fingist. Eg trúgvi, at enn stendur hin gamli bevillingur við makt, so teir kunnu rokna við honum. Vit hava halt jarnskinnarabrýr fyrr her í Føroyum, sum ikki eru so langvalig dømi at taka eftir. Teir hevdu eina í Vágum, hon datt niður ein regndag, tá einki fólk var hjá, men um vit kundu fingið lagað tað soleiðis eisini norðuri í Vík, at tann brúgvin gev so vael, at detta niður táið einki fólk er hjá, so er vael sloppið, og so kann hon jú gera nytta so leingi hon stendur.

M. A. Winther: Eg haldi, at vit skulu rokna við, at tað er ein hátt, í hvussu er fyri eina tíð, at ganga yvir til eina brúgv sum hana, ið her er fyrisligin av Soren

Sorensen. Táið vit nú hala um brúmna á henda hátt, so verður hon nýtandi eina góða tíð, og í næsta umgangi fáa Vikar menn eina góða brúgv, tá teir aftur koma og sokja studning, tí tá vilja okkara peningaviðurskifti vónandi vera nakað væl betur enn nú. Um vit siga, at bygdin, táið henda brúgv skal gerast, í besta fall sleppur við 4000 kr. í útreislu, er tað rættuliga nógv fyri eina lítla bygd at fara undir. Allar útreislur eru vaxandi, lønirnar eru uppgangandi, og mau troystar sær illa til at roknu við teim í einum yvirslagi táið ein hugsar um tey stóru tøl, ið koma burtur úr. Ja, tað kann sigast, at forsýnið hevir verið við í Vágum, tá brúgvin datt niður, men eg vil ikki hopa, at teð skal koma so vítt norðuri i Vik, at brúgvin fer. Men tað moga vit jú altíð siga, hvørja fer tingið noyðist at vísa eina umsókn frá sær um lendustøðir ella bryr, at vit vóna, at einki ilt ber á av tí, at vit einki kunnu lata, tí einki er at lata av.

M. Samuelsen: Eg skal siga, hvat Søren Sørensen segði við meg, ella við okkum her norðuri; at tað vóru hvørki jarnskinnarar at fáa her á landi, ei heldur utanfyri Føroyar, og tað var útilukkandi av teirri grund, at hann ikki gjordi yvirslag altfyri eitt yvir jarnskinnabrúnna at skoyta upp í steinbrúnna. Hvat ið viðvíkir reparatión av brúnni, so er miðstokkurin kavrotin, meðan vit ikki vita, um stokkarnir úti við eru rotnir, men teir liggja og sjarra, og vit havu so roynt at hava eitt gólv, ið kann bera vektina.

Vit hava altso roynt at hjálpa okkum sum vit kunnu, og um stokkarnir úti við ikki fara, so er gott, men bresta teir, so verður sikkurt manuskaði. At tað verður dýrt fyri kommununa, ja, tað vita vit, men vit vilja royna at sloppa við einari størri útreislu eina ferð fyri allar. Løgtingið hevir eisini lettari givið studning til størri útreistur enn til smáar, og tað hevir givið størri studning til steinbrýr enn til aðrar brýr. Vit høvdu eitt andragandi inni til løgtingið um at hæðka bevillingin í forhold til prishæðkanina, men tað varð noktað. So varð tað meylað aftur og fram um hetta, og vit høvdu heldur ikki komið við nokrum í ár, um ikki brúgvin nú var so illa farin, at nakað mátti gerast: tí máttu vit royna eina ferð enn.

A. Samuelsen: Vit hava í sínari tíð meint í budgetútvalginum, at tað var heldugast at byggja steinbrýr, og vit hava tí premierað steinbrýr við at geva størri studning til tær enn til aðrar brýr. Tað hevur ikki bert verið fyri at fáa solidar brýr, men eisini av nationalum grundum; og minnist, at tingmaðurin úr Kirkjubø helt: lat okkum endiliga byggja steinbrýr og styðja okkara heimliga industri. Til tingmannin úr Norðstreymoy vil eg siga, at táið vit í sínari tíð ikki vildu ganga við til at hæðka bevillingina, so var tað tí, at vit sogdu sum so: vit vita ikki nær stigningurin endar; vit kunnu væl hæðka nú, men vit vita bert ikki, um tað vil svara til prísirnar, táið arbeiðið verður gjørt.

M. Samuelsen: Allareiðu tá tilboðið um hesa brúgv var til licitatión, var eg uppi hjá amtmanninum og spurdi hann um prísir á jarni og cement. Hann forhoyrdi seg um tað og fekk upplýst, at jarn fór at hæðka 100 pct., cement 50 pct. Viss løgtingið skal dekka tær útgiftir, sum brúgvin eftir yvirslaginum fer at beloypa seg til, so verður tað nógv. Men forholdini hava nú einaferð gjort, at tað er so komið sum tað er.

VI. Brúgv um »Hórará« í Vestmanna.

Ordføraren greiddi frá nevndarálitinum og mælti til samtyktar.

VII. Brúgv um »Kirkjuá« í Miðvágum.

Ordføraren greiddi frá fleirtalsálitinum og mælti til at samtykkja tað.

A. Samuelsen: Vit í minnitalinum meina ikki at tað nýtist at bevilga hesar pengar . . av teim sonn grundum sum ordføraren nevndi: at kommunan hevur haft plikt til at viðlíkahalda ta gomlu brúnna. Eg kann vera einigur við ordføraran í tí, at einaferð má tað tíðspurkt koma, tá kommunan ikki longur kann garantera fyri hvussu leingi brúgvin kann halda, men her er einki upplýst um, at brúgvin var so gomul, at hon er niðurdottin av aldri. Tvalgið átti at lata vera at stilla forslag um at geva henda bevilling í ár, tí nú hastar tað jú ikki við tilskotinum, brúgvin er gjord av forstandarskapinum. Tað er aldeilis ikki pátreingjandi. Í innberaðtuningunum frá sýslumannunum ífjor fyrilá einki um at brúgvin var so vánalig, at hon kundi ventast at detta, ella minnist Mads Winther nakað um tað? Nú er tað ganska vist vanskuligt hjá sýslumonnum at halda løgtingið á jour við hvussu brýr

nar eru. Sýsluumsitjarir eru já ikki fagmenn, teir mugu retta seg eftir, hvat skilamenn siga fyri teimum. Og táið sýsluumsitjararnir innberætta at brúgvir eru vánaligar, so eru tær tað gjarna eisini. — Eg skal ikki taka mær tað nær, um løgtingið viðtekur at geva Vágamonnum hetta tilskotið, viss man ynskir at avfinna seg við monninar uten at fyritaka nakað undirsokilsi. Men hetta er eitt principspursmál, eitt nokkso stórt principspursmál, tí fyri so vítt vit glatt vekk ganga við til hetta, so hava vit harvið bundið okkum til ein praxis, sum vil føra til, at vit koma til at leva uppí saman fyri at brúka eitt populert úttrykk, at bevilga til tær sonn brúgvir ár eftir ár.

Orðføraríu: Viss sýsluumaðurin hevði gjørt atfinning at brúnni, so máttu vit í løgtinginum pálagt forstandarskapinum at seta hana í stand. Men tað útihukkaði ikki, at forstandarskapið næsta ár kundi komið aftur við umsókn til tingið um at fáa tilskot. At leggja nakað varigt forpliktilsi á kommununa til viðlíkahald, har materialini vóru slik at tey máttu forfarast kundu vit ikki. Eg eri júst ikki so glaður við at leta bevillingin í hesum formi, men tað kemur afturumaftur í hvussu er. Æntin mugu vit siga nei sum minnitalið ella leta hetta bolopið eftir teim almindiligu reglunum.

R. Niclasen: Hin fyrra brúgvin var í sovorðnum standi at tað var óforsvarligt at gera hana ístand; forstandarskapið tók sær tí uppá at gera eina nýggja brúgv og hevur sjálvt borið umkostningarnar. Seinri kom man í tankar um at løgtingið fyrr hevði bevilgað til líknandi fyritokur. t. d. brúnna um Leynará, tá hon trongdi til eina stærri reparatión. Hin fyrra brúgvin var 18 ára gomul; tað kann gott vera, at forstandarskapið hevur viðlíkahaldsplikt men spursmálið er hvussu leingi henda pliktin skal vara. Tað kann tá ikki vera í allari ovigheit. Í hvussu er: Tað var blivið pátrongjandi neyðvendigt at fáa gjørt eina nýggja brúgv, tað hevur forstandarskapið gjørt, og nú verður tað løgtingsins sak, um tað vil leta kommununa fáa hesar pongar. Vágamenn taka sær ikki hjartasorg av tí, um teir oinki fáa.

A. Samuelsen: Noi, tað vænti eg heldur ikki, at tað verður sorg í Vágum, um teir ikki fáa hesar 2[5 krónurnar: Hevði eg tráð tað, so skuldi eg ikki verið móti. Eg vil ikki fáa Vágamenn at syrgja. Hevuðsatfinningin er eftir míinari meining tann, at vit ikki fyrst leta undirsokja, um brúgvin hevur staðið soleingi, at viðlíkahaldsplikturin kundi ætlast at vera hvarvsfallin. Eg havi nakað ilt við at fata begrepið «evig tíð», men eg veit, at tað er ein munur millum «evig tíð» og 18 ár. Vit hava eina traubrúgv norði í Vík, hon hevur vart meira enn 18 ár og 25 við; Víkarbrúgv man vera meira enn 30 ár. Bevilga vit hetta glattvekk utan undirsokilsi, so eru vit hundnir til næsta ár at leta til eina brúgv, sum kanska er 15 ára gomul. Tað er hetta princípið, eg eri hangin fyri at koma inn uppá; sjálvt pengabelopið betýðir jú ikki nógv. Eg eri fegin um, at Vágamenn hava gjørt sína brúgv sum koyrubrúgv. Tað er rætt. Teir hava her arbeitt í løgtingsins anda. Men teir sleppa nakað lætt frá tí. Eg ætli mær at minnast til hetta tilfeldi tá onnur anlegg koma fyri.

R. Niclasen: Tað er gott, at A. Samuelsen má geva okkum tað skoðsmál, at vit arbeiða í løgtingsins anda.

A. Samuelsen: Eg havi sagt hetta viðvíkjandi, at tit hava gjørt brúnna so breiða, at tað kann koyrast um hana.

R. Niclasen: Og tað er júst tí brúgvin er gjørd eftir tingsins tykki, at hon er so dýr.

A. Samuelsen: Tað kann ikki vera grundin til, at skimararnir eru rustaðir, at hon var ov smol.

M. Samuelsen: Eg vil ikki ráða til at gera brúgvar av skimrarum, tá tær ikki vara meir enn 15 ár. Okkara brúgv, sum er av træ, hevur staðið í 40 ár.

R. Niclasen: M. Samuelsen hevur loteinkiligheitir viðvíkjandi jarnskimrarum. Men alt menniskjansligt kann forfarast. Kanske jarnskimrarnir, sum vit brúktu, hevdu feil. Eg vil tí biðja M. Samuelsen hyggja væl eftir jarnskimrarunum, táið farið verður at byggja brúnna um Khiftá.

A. Samuelsen: R. Niclasen sigur, at alt menniskansligt forferst: men hann heldur, at jarnskimrar forfarast ikki, tá nnn fyrst hyggur væl eftir teimum.

R. Niclasen: A. Samuelsen tykist at sita inni við tí hægstu fornuft.

A. Samuelsen: Tingmaðurin í Vágum talar um fornuft. Eg kann garantera fyri

at tað er minst líka nógv fornuft hjá forstandarskapinum í Vík sum tað er hjá forstandarskapinum í Vágum.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Hækkan av studningi til kommununlæknar.

2. viðgerð.

Orðforarin (R. Nielasen) greiddi frá nevndarálitinum og legði til, at tingformaðurin hevði gjørt eitt broytingaruppskot viðvíkjandi studninginum til hesar báðar læknarnar. Hann mælti til, at sakin fór til 2. viðgerð.

Formaðurin sagði frá í hvørjum lutum broytingaruppskotið skilti sog frá nevndaruppskotinum og at man hevði fingið ein lækna til Sandoyar á tey vilkor, at tingið játtaði tað sum stóð í nevndaruppskotinum. Tað vildi tí verða ólagaligt, um man ikki skuldi kunna semjast um tað.

R. Nielasen: Sum eg forstandi amtmannin er tað ikki regeringin, sum ynskir hetta sum stendur í broytingaruppskotinum, men amtið og fysikus.

Formaðurin: Det er Regeringen, som har sogt Bevilling til Lagon paa Sando og gør det afhængigt af, at Kommunerne og Tinget betaler, hvad der er foreslaaet. Det er ikke rigtigt, at det kommer fra Amtet og Fysikatet.

N. Debess: Táið man kemur nakað til læknaviðurskifti í Føroyum, kann tað tykjast nøstan hóttiligt fyri lógtingið at bevilga 1000 kr. til flutning av læknum, tí vit vita jú, at teir læknar, ið koma her, verða her sum oftast ógvuliga stutt, og ferðast nakað dúliga, so hetta verður helst ein árlig útreisla fyri tingið. Tað mátti gjørt statinum tað sama, hvaðani peningurin kemur annaðhvort frá lógtingi ella frá kommununum. Eg vildi tí helst stemma fyri nevndaruppskotinum. Eg vil ganga út frá, at tær kommunur, ið vilja hava lækna, fyri tær er tað av so stórum týdningi at fáa ein lækna, at tær væl vilja lata 500 kr. meir fyri at fáa hann her upp.

Formaðurin: Med Hensyn til Flytningsudgifterne maa jeg gøre opmærksom paa, at Lagtinget ikke er bundet til disse Udgifter i Fremtiden. Bevillingen er kun regnet at gælde for disse to Embedsbesættelser og det kan maaske klare Diskussionen naar det bliver oplyst, at det her drejer sig om en øjeblikkelig Udgift og ikke en fremtidig vedvarende Udgift.

A. Samuelsen: Eg havi undirskrivað betonkningina við forbehold, og eg skal tí her greiða frá míninari støðu. Hvat ið fyrst viðvíkir spurninginum um, hvaðani vit skulu fáa doktarar, so er tað so, at vit *skulu* hava teir, og fáa vit ikki doktorar, ið eru útdannaðir við Keypmannahavnar universitet, so noydast vit at fáa teir aðrastaðni. Eg haldi meg vita, at teir íslendsku doktarar, ið eg forovrigt havi alla respekt fyri, í teirra útlatnnilsi eru væl attanfyri hinar. Men fáa vit ikki doktarar við fullum útdannilsi, so mega vit taka aðrar, ið ikki hava fult útdannilsi. Eg vil meina, at vit fyrst og fremst royna at fáa doktarar útdannaðar í Keypmannahavn, og fáa vit ikki tað, so annars hvaðani vit kunnu fáa teir. Tað er sagt, at betala vit bert nógmikið, kunnu vit fáa doktarar úr Danmark. Men man kann eisini betala ov nógv, og tað kann vera, at vit nú eru kommin til tað punkt, hvar ikki meir kann latast aftrat. Ministeriið hevir higartil stillað seg ónotuliga kulant. Tað er ministeriið, ið hevir tikið hesa støðu, tí tað hevir væl fingið tilsagn frá finansútvalginum, men einki er herum enn avgjørt av ríkisdegnum. Ministeriið bjóðar okkum at hækka sítt tilskot frá 2100 kr. til 4000 kr., tað má absolut sigast at vera kulant gjørt. So er ministeriið komið inn uppá nakað nýtt. Teir hava fingið at vita, at ein vanskeligheit við at fáa doktarar her upp, er at tað er so dýrt at ferðast við nógvum í viðfarslu. Ministeriið heldur tá sum so. Tað er nóg mikið við bevillinginum, tað er ikki tað, Føroyingar ynskja, men doktorar, og so vilja teir taka part í flutningsútreislunum. Eg veit, at hesar útreislur fyri embedsmenn her uppi have verið ógvuliga stórar. Fyri reinar statsembedsmenn betalir statskassin allan flutningin. Men her er tala um kommunalar embedsmenn við statsstudning, og so er ministeriið so kulant at vilja betala $^2/_3$ av útreislunum. So er tað spurningurin, um lógtingið skal lata 1000 kr. ella lata 500 kr. og fáa 500 kr. frá kommununum. Táið og havi betoinkiligheit við at seta 500 kr. í staðin fyri 1000 kr., so er tað tí kommunurnar fáa so nógvar útreislur frammihjá til doktaranna, til forv. a. ið krevst. Man kann keypa gull ov

dýrt, og tað er ein spurningur, um vit, ið representera Føroya fólk, kunnu siga við kommununar: so nógv mega tit betala aftrat, annars fáa tit ongan doktara; so kann tað vera, at kommununar siga, so mega vit vera uttan doktara. Og tað vil ikki vera gott. Eg havi beteinkiligheitir við at hálvera hatta beløpið, tí kommununar hava so stórar útreislur longu til doktara, at tað kann væntast, at tær ikki kunnu taka meir uppá sog. So kann tað sigast, at so kemur løgtingið at taka allar tær 1000 kr. N. Debess segði, at 500 kr. hava ongan týdning fyri kommununar, hava tær ikki tað, so hava tær tað eina minni fyri løgtingið. Eg hoyri til teirra, ið meina, at tann finansielli standur her á landi ikki er góður, men sjálvt um vit ikki fara so vítt, sum eg havi hoyrt sumar siga, at vit vilja hava ein skatt av 40 kr. pr. høvd, so meini eg, at løgtingið altíð er fort fyri at taka allar tær 1000 kr., og tað haldi eg vera tað heinasta at gera. Eg veit ikki hvussu viðurskiftini eru í Sandoy, um teir har vilja lata hesar 500 kr. ella ikki, teir hava ikki tikið stilling til hetta, men eg veit, at hinar kommununar, ið eisini ógvuliga fegin vilja hava doktarar, tær hava so stórar vanskeligheitir við at betala, hvat annars krevst til útreislur fyri at fáa teir, at um vit løggja hesar 500 kr. aftrat, so verður tað, í hvussu er, ringt at fáa doktara til Eiðis. N. Debess segði, at tað vóru stórar útreislur til flutning av læknum tí teir ferðaðust so aftur og fram, og amtmaðurin upplýsti, at vit vóru bert bundnir til hesi tvey ansøtilsi, ja, men eru vit fyrst komnir inn uppá henda veg, so eru vit bundnir líka væl sum vit eru bundnir nú til torvið og allar hinar útreislurnar. Hava vit rætt hondina út, verður hon hildin fast, tað mega vit vita; er hetta latið eina ferð, má tað eisini latast í framtíðini.

Eg kann ikki halda við tingmanninum í Havn í tí, at doktararnir hava verið so óstadigir; á sumum plássum hava teir verið nokso leingi. Sandoyardoktarin hevur verið rættiliga leingi, Eiðisdoktarin var eini 5—6—7 ár. Havnarmenn hava ganska vist ikki havt eydnuna við sær í so máta, teir hava ikki haft doktarar so leingi sum tað var ynskiligt, men eg vænti ikki, vit fáa boð frá teimum um at fáa ferðastyrk; tað besyrgja teir sjálvir. Tað vit sláa fast hor, kemur ikki bara at gelda Sand og Eiði, tað vil eisini koma at gelda fyri Vágoynna og Víg; fyri sovítt hevur tað principiellan betýdning. Eg eri ógviliga beteinkiligur við at skula býta hesar 500 kr. millum løgtingið og kommununar, viss tað skal forast yvir á toy sókn, hvar doktarin er.

N. Debess: Eg eri als ikki beteinkiligur við, at løgtingið skaffar hesar pengar, — tað haldi eg vera beint, — men eg eri beteinkiligur við tað, tí tann mátin, tann vegur, løgtingið má ganga fyri at fáa hesar pongar, er so órættferdigur. Av teirri grund eri eg beteinkiligur við at disponera yvir hesum pengum, soleingi sum vit ikki hava fingið eina broyting uppá hetta umráði. Viðvíkjandi tí, at doktararnir høvdu sitið leingi ella stutt í embætinum, nevndi Andr. Sámalsson, at doktarin á Eiði hevði verið har eini 5—6—7 ár ju, hvat talið er nú rætt? Men viss 6 doktarar flyta í løpi av 6 árum, so verða tað nógso nógvir pengar hjá løgtinginum at lata til ferðaflutning. Og tað ivist og ikki í: eru vit eina ferð slidnir inn uppá hetta, so fast ikki læknir her til lands, utan at teir krevja hesar økvemmiligheitirnar.

Orðføraríu: Eg havi alla tíðina tonkt mær, at tær 3000 kr., ið settar eru sum hægsta beløp fyri flutning, er ovnógv, og eg trúgvi, at man í teimi flestu tilfeldum kundi spart tær. Eftirsum eg snakkaði við kommissiónina, sogdu teir seg at vilja syrgja fyri at fáa ungar læknar hegar. Teir behøva jú ikki at taka møblar við sær, tað kunnu teir keypa sær í Havn, líka bíligt ella bíligari enn niðri. Tá læknar fara av landinum, selja teir jú næstan altíð sínar møblar her — har verður altso einki at betala flutning fyri til Kjøpinhavn, hvatið innbúgv viðvíkur, og tað er jú tað, sum kostar mest. Hesar 3000 kr. er absolut ovnógv. Tað er eisini galið at seta nakað fast beløp, eru vit slidnir inn uppá at játta ein sovorðnan maximums-sum, so sleppa vit ikki frá honum aftur. Tíverri er Sandoyin gingin inn uppá alt, sum amtmaðurin hevur fyrisligið, men teir vilja sjálvsagt gera alt fyri at fáa lækna, tað hevur jú víst seg nokkso ónoguligt hjá teimum.

A. Samuelsen: Eg forstandi tingmannin í Havn, hr. Debess soleiðis, at hann er einigur við mær í principinum: at løgtingið, ikki kommununar, skulu betala flutningsunkostningarnar. Tað vit ikki eru einigir um, er, hvaðani løgtingið skal taka hesar pengar; hann hevur beteinkiligheitir við at líkna teir á amtsrepartitiónsfondið. Her eru vit fullstendiga óeinigir. Eg meini aldeilis ikki, at tann beskattningsmáti, vit her brúka, er órættfordigur. Annars haldi eg eisini — tað havi eg altíð hildið — at

tað er rætt, at vit disponera við so lítlum peningi sum møguligt, men viss Nyholm Debess meinar, at tað núverandi fleirtal ikki kann brúka minni enn tað ger, um tað kníppir seg nógvo mikið, so er tað grúiligar átsiktir, tí teir hava í hesum seinasta árinum brúkt meiri enn vit hava brúkt tey seinastu 10 árini — eg hugsi ikki, eg taki munnin ovfullan, um eg sigi tað. Skulu vit koma inn uppá at betala flutningsumkostningar, so má tað vera so, at vit betala, hvat hvor ferðin kostar, 1/6 part av teim samlaðu útgiftunum, sum ikki mugu yvirstíga 3000 kr. Tað er mikið møguligt, at vit yvirhøvur kunnu fáa yngri, ógiftar doktarar hertil, og at tað so verður bíligari, at teir keypa sínar møblar, pinnastólar o. l. í Havn. Man kundi jú eisini í øllum vesentligum møblera doktaraloyligheitirnar sjálvir — ja, eg skal ikki ganga víðari, men hvat skuldi verið í vegin fyri, at teir eisini fingu sær konur heruppi — tað er tó hent fyrr. Eftir verður so bara at betala, tá teir fara avstað aftur. Undir øllum umstendigheitum mugu vit ikki forstanda tað, sum man í hvørjum tilfeldi skal av við 3000 kr. Í teimum allarflestu tilfeldum, hvar lað nemliga dreyar seg um ógiftar doktarar, skuldi tað verið merkverdugt, um flutningurin beleyp seg til meir enn o. u. 1000 kr. Hetta eiga vit at betóna og eg vil biðja ørðføraran sláa fast, at soloiðis forstanda vit tað.

N. Debess: Tá her er sett eitt belop upp til 3000 kr., so mugu vit rokna við tí og ikki við minni. Tað kenna vit til, tá embætismenn flyta til og frá, hvat tað kostar. Andrass Námalssons bemerkningar um logtingsins peningadispositiónir skal eg ikki koma inn uppá; tann spurningurin hoyrir neyvan heima undir hesi sok. Men í allari almindiligheit máttu vit tó kunna verið sinnigir um tað, tá vit siggja allar hesar sakir, sum krevja studning, nakrar 100 kr. her, aðrar 100 kr. dér, og sum allar mugu útsetast til nasta ár, at tokkum er torvur á at fáa pening. Tað syndarliga er ikki, at vit brúka ovnógvan pening, tí tað hava vit aldri gjørt, men at logtingið ikki skal hava meir at disponera yvir.

A. Samuelsen: Tað framgongur av bræfinum frá amtmanninum av 2. september 1919, at her ikki er talan um 3000 kr. í øllum tilfeldum, men bara somikið, sum gongur til flutningsumkostningar, tó ikki meira enn 3000 kr. — Eg kann geva Nyholm Debess rætt í tí, at spurningurin um fleirtalsins pengadispositiónir ikki nettupp hoyrir innundir hesa sak, men tað var hann, sum kom inn uppá hana, og sum gav mær anleiðing til mínar bemerkningar. Men eg skal gjarna lata vera at tosa um tað.

M. Samuelsen: Eftirsum henda sakin: doktarin á Eiði, berorir nog so sterkt, vil eg gera nakrar fáar bemerkningar, sjálvtum her er sagt tað mesta av tí, ið sigast kann.

Tað er ein stórur forandringur fyrigingin við hesi sak síðani eg kom suður á ting. Tá lá hon soleiðis fyri, at viss doktarin fekk vissu um 5000 kr. í ársinntoku vildi staturin lata 2400 kr.í til skot — forstandarskapið skuldi plikta seg at lata 300 leypur av torvi. Nú er talan um, at staturin vil hækka tilskotið til 4000 kr. árliga við teimum treytum, at forstandarskapið letur 1000 kr., frít hús og 400 leypur av torvi um árið, og løgtingið aðrar 1000 kr. Hetta mest fólk har norðanfyri ivaleyst fara at halda er ein tung byrða. Men doktaraspurningurin er undir øllum umstendigheitum fyri fólkinum í Víkar søku ein so viktug sak, at tey vilja strekkja seg til tað ýtarsta fyri at fáa doktara. Og av tí, at Sandingar hava tikið við hesum treytum frykti eg fyri, at vit eisini noyðast at ganga undir tær. Hvat angongur hesum 500 kr., sum distriktið skal betala, so er tað jú ikki so stórt belop, um tað enn kann muna væl aftrat øllum hinum. Eg vil stemma fyri, at tann eini triðingurin av ferðsumkostningunum gongur útav logtinginum.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Lækni í Vágum.

3. viðgerð.

Ørðforarin (R. Niclasen) greiddi frá nevndarátlitinum og maelti til, at sakin fór til 3. viðgerðar.

A. Samuelsen: Eg havi tikið eina serstøðu her. Eg havi kunnað verið við til at biðja um statsstudning til lækna í Vágum og til, at vit frá okkara tingkossum skulu lata 1000 kr. Men nevndin hevur viljað behandla hesa sak sítt sindur annar leiðis enn líknandi sakir. Og tað kann eg ikki vera við til. Eg haldi, at tað eina punktið, sum eg ikki kann samsinnast við, er óheldugt. Tí her sigist, at vit vilja hava

ministeriið til at betala, men vil ministeriið ikki, so betala vit sjálvir. Hetta er ikki rætt. Um ministeriið fyrst hevði sýtt fyri at betala, so var tað nakað annað. Men ministeriið hevur ikki noktað. Eg haldi í al fall, at Debess nátti verða boteinkiligur við, at logtingið skuldi láta so nógvar pengar. Tí íáðni, tá ein onnur sak var fyri, helt hann tað vera so ógviliga nógv fyri at tingið skuldi láta 500 kr. Lat okkum bíða við at hevilga hesar pengar av okkara kassum til aktiukapitalurin til farmaskipið verður útviðaður. Tá kunnu vit betala ekstraordinert; sum nú er, hava vit bara lán. Men næsta ár fara væl fruktirnar at vísa seg av tí, vit hava sáðað í ár. Vit eiga tó at bíða inntil vit fáa at vita, hvat ministeriið vil gera. Vit skulu ikki koma fram við eini sak, sum gevur teimum har niðri kalt vatn yvir høddið.

R. Niclasen: Vit hava í 1903, 1907, 1908, 1909, 1910, 1911, 1912, 1914 og 1915 havt bønarbræv inni á tingi um at fáa statsstudning. Men altíð vóru vit avvístir, antin tað so er illa talað fyri sakini ella tað liggur ein óvilji aftanfyri. Eg vóni nú, at tingið ikki sleppur okkum upp á fjall. Tí tá teir í Danmark ikki vilja hjálpa okkum, so eigur tingið at gera tað. Hetta er ikki diplomatiskur kunstur av okkum, men okkara hjartans meining. Eg haldi, at herí gongur mann líkafram til sakina. Vil regeringin ikki játta tað, sum vit hava søkt um í so mong ár, ja, so mugu vit hjálpa okkum sjálvir. Um A. Samuelsen vildi ganga saman við okkum her, so gjørdi hann eina góða gerð og so vildi tingið staðið meiri sameint.

A. Samuelsen: Tað kundi honda, at Vágasakin lá eitt sindur øðrvísi í ár enn fyrr. Her hevur nú verið ein dansk kommissión av doktarum, og teir hava vist eisini vitja Vágarnar og hava tá væl sæð, at Váganmenn viðvíkjandi lækna ikki eru so væl stillaðir. Man kann væl siga, at fult orðnað eru viðurskiftini ikki fyrr enn doktarin situr í oynni. Kannske nú kommissiónin hevur sæð, at doktarin eigur at sita í oynni. Hví skulu vit so ikki geva teimum líkindi til at fáa andragandi bevilgað. R. Niclasen sigir, at tingið hevur stillað seg so og so væl til sakina, og eg sum ríksdagsmaður havi illa tikið mær av sakini. Men eisini aðrir menn enn eg hava verið ríksdagsmenn og gjort í doktarasakini í Vágum og interesserað seg nógv fyri henni undir valgagitasjón; men teir fingu hana tó ikki í lag. Eg sikti tó ikki her til Effersøe. R. Niclasen heldur, at tað fær ein keðiligan betýdning, at eg ikki gangi saman við nevndini. Men eg havi burt tikið serstøðu til tann spurningin, sum viðvíkur tinginum og tingkønsstuttum. Man kundi fyrst biðja regeringina um endiligt svar um teir vildu fyrisláa studning, og um tað ikki í ár bleiv til nakað, so máttu vit hugsa um tað. Men nú má mann fáa tað inntrykk at spurningurin skal loysast. Um ministarin ikki vil, so vilja vit. Og tá hevur mann eisini bundið hendurnar á mær, um eg komi aftur á ríksdagin. Tí eg kann tá ikki við kraft framseta hetta kravið úr Vágum. Um sakin fer soleiðis niður, eri eg forholdsvís óskyldugur, um eg einki fái, tí so hevir løgtingið lagt sakina soleiðis, at eg ikki kann krevja nakað við kraft.

R. Niclasen: Eg veit ikki, hvat ið A. Samuelsen kann gera í hesari sak. Skal man døma aftur, hvat hann og Effersøe, meðan teir hava verið ríkisdagsmenn, enn hava gjørt fyri sakini, so verður tað lítið, um tað kortini ikki kann sigast, at teir beinleiðis hava forðað fyri henni. Táið Mortensen var fólkatingsmaður, talaði hann væl fyri sakini, so vítt eg veit, men um A. Samuelsen hevir talað fyri henni ella ikki veit eg einki um. Í 16 ár hava vit í Vágum stríðst fyri hesi sak, og vit hava einki úrslit fingið enn. Tað tykist ikki, sum tað verður tikið nakað hensýn til, hvat teir føroysku ríkisdagsmenn siga í einari sovorðnari sak; har lurtar ministeriið bert eftir sunnheitsstýrinum. Eg trúgvi, at um A. Samuelsen hevði arbeitt í 16 ár fyri einari sovorðnari sak, so hevði hann verið keddur av tí og roynt allar vegir til at fáa sakina aftur í eitt rætt skil. Tað er við hesum sum við útroðri; hann ið dúliga ror út, hann fiskar umsíðir, og táið vit halda við at royna, finna vit væl eina ferð eitt nið, ið roynist væl. Vágarnar við teirra 2000 menniskjum eru nær um dupult so stórt distrikt sum hini bæði, Eiði og Sandoy við teirra 1400, og tað er undarligt, at bæði hesi pláss skulu verða hjálpt og Vágarnar ikki. Men vit ætla okkum at halda við at søkja um hetta til vit eina ferð fáa tað.

A. Samuelsen: Hr. R. Niclasen legði hvorki meg ella hr. Effersøe undir at hava forðað hesum, men helt, at vit hevdu heldur ikki gjort stórt fyri sakini. Men Mortensen, táið hann var fólkatingsmaður, man hann hava gjort so stórt fyri hana? hann hevir

kortini einki fingið í lag. Men tað hevir verið ein maður uppi í hesari sak, sum R. Niclasen ikki novndi, sjálvur chefurin fyri sjálvstýrispartiinum, tingmaðurin úr Kirkjubø: hann var fólkatingsmaður, tá sakin kom fram á fyrsta sinni. Tá lá sakin væl fyri, tí tá var hon einsamøll. Eg havi aldri dugað at fata, hvussu ein maður hevir kunnað misrøktað eina sak soleiðis, og ikki fingið nakað burtur úr henni tá. Síðani eru komin krav um doktarar úr so mongum plássum, so nú er tað so nógv ringari at fáa í rætt skil. Síðani tingmaðurin úr Kirkjubø fór frá sum fólkatingsmaður, hevir hesa sak ikki verið lætt. Mortensen kom inn í politikk so mikið seinni, tað eru so fá ár síðani, og tá var sakin ikki so greið, og tað skuldi ein maður, ið var betýðiligt raskari enn hann tí at fáa skil á hana. R. Niclasen hevir hoyrt, at jú oftari ein fer á flot, jú meiri útsikt hevir man til at fiska nakað. R. Niclasen talar sum hann kundi verið útróðrarmaður, men hann má hava hoyrt hatta frá onkrum, hann hevir jú ikki nógv forstand uppá útróður, tað vita vit allir. Men tá man fer til útróðrar, má man gera seg væl út, tað nyttar ikki bert at fara á flot, man má hava bæði ongul og stein, og gott agn, og duga at egna væl og leggja mið, um tað yvirhøvur skal nytta nakað at fara út.

R. Niclasen: Man skuldi trúð, at A. Samuelsen hevði verið útróðrarmaður, sum hann tosar, men so vítt eg veit, hevir hann altíð verið uppi á landi; hann heldur hánt um mín kunnleika til sjógvin; eg havi verið ein ógvuliga dúligur útróðrarmaður til eg var 20 ár og dugað væl at fingist við bæði ongul og stein, og at egna og leggja mið. So fanst A. Samuelsen at Edw. Mortensen og brigdaði mær harnæst, at eg ikki hevði nevnt Patursson. Ja, hann var mær ikki í huga tá, men nú A. Samuelsen minnir meg á tað, so vil eg siga, at hann gjordi eitt ógvuliga stórt arbeiði fyri at loysa tann spurning á ein lagaligan hátt við at royna at fáa sanatoriið lagt í Vágum. Tað var samtykt á tingi, men á einum eykatingi var tað broytt av sambandsmonnum og sanatoriið varð tikið frá Vágum, og síðani verður tann spurningur um doktara í Vágum ikki lættur at greiða.

A. Samuelsen: R. Niclasen tekur feil. Tað var ikki sum ríkisdagsmaður, at J. Patursson gjordi hatta við sanatoriið; hatta var aftaná, at hann var farin frá sum fólkatingsmaður; men áðrenn 1906 var hann fólkatingsmaður, og tá gjordi hann einki. Viðvíkjandi hvat Effersøe og eg hava gjort fyri sakina, so hava Vágamenn eina ferð haft ein doktora, og tann doktaran skaffaði Effersøe teimum, bæði hevillingin og eisini mannin, og um Effersøe ikki hevði hjálpt teimum, so hevdu teir ongan doktora fingið.

O. Effersøe: Hr. R. Niclasen fremdrog en Begivenhed fra vor politiske Historie, nemlig Forholdet mellem Sanatoriet og Ansættelsen af en Kommunelæge paa Vaago. Sagen var den, at man koblede disse to Sager sammen og saa bort fra almene færøske Forhold til Fordel for en enkelt Ø. Færøerne som Helhed kan kun være tilfreds med, at Sanatoriet nu ligger, hvor det ligger og ikke ved Sørvaagsvand.

R. Niclasen: Frá okkara síðu betraktar man sanatoriið sum liggjandi so óheldiga, sum var tað tann reina líkkista. Og tað vórn sambandsmenn, sum tóku sanatoriið frá okkum og løgdu tað í Hoydal. Táið A. Samuelsen sigir, at Effersøe skaffaði okkum doktara, so kom Krohn til okkara sum innvalid, og vit tóku væl ímóti honum, og tá hann fór frá okkum, var hann komin fyri seg og fekk ein góðan stilling niðri í Danmark; men tað var aldeilis ikki Effersøe, ið skaffaði okkum hann, kann vera hann skaffaði hann til Sandoyar, ikki til okkara.

O. Effersøe: R. Niclasens Udtalelser om Sanatoriet er kun en løs Paastand.

R. Niclasen: Effersøe skyldar at framfora eina aðra framstilling.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Nevnd viðv. løgtings- og skattalógini.

3. viðgerð.

J. Patursson: Eg skal bert mæla tinginum til at samtykkja meginhugsanina uppskotsins, og velja eina nevnd til at samráðast við menn valdar av ríkisstýrinum um skattalóg og løgtingslóg.

O. Effersøe: Med Hensyn til Spørgsmaalet om Kommissionens Opgave udtalte Landsstyrets Ordfører sig ved Sagens 2den

Behandling. Han benævnede Kommissionen som sin mellemlandanevnde og gik ud fra, at Kommissionen var nedsat for at ordne et vist forfatningsmæssigt og finansielt Opgør mellem Landsdelene, mellem Færøerne og det øvrige Rige. Dette maa altsaa være Flertallets Opfattelse. Saaledes forstaar Flertallet Justitsministeriets Henvendelse til Lagtinget. Mindretallet vil, som det tydelig fremgaar af sammes Udtalelser i Betænkningen, ikke være med til at nedsætte en Kommission, hvis Opgave opfattes saaledes. Jeg skal indskrænke mig til at udtale dette, idet jeg iøvrigt henviser til Udvalgsbetænkningen.

Flertalsuppskotið pkt. 1 varð sett til atkvøðu.

A. Samuelsen: Um tað fyriliggur ein formanns avgerð um avstemningina, er jú einki við tað at gera, men um tað ikki er, vil eg tillåta mær at spyrja, um tað ikki hevði verið hensigtsmessigt at sett minnitalsins forslag fyrst undir avstemning, eftirsum tað er tað mest vidtgangandi. Eftir vanligum siði átti tað at koma fyrst. Eg vil henstilla til formannin, at vit bróka henda vanliga vegin.

Formaðurin: Jeg kan ikke se, at de to Forslag i Forhold til hinanden kan betragtes som mer eller mindre vidtgaaende. Der vil altsaa blive stemt over Flertallets Forslag.

Flertalsuppskotið varð samtykt.

Fundur tisdag 16. september.

Hækkan av løn til roknskapargranskara.

3. viðgerð.

Orðfararin (M. A. Winther) mælti til at samtykja nevndaruppskotið.

Hetta varð samtykt.

Vidkan av telefonnetinum.

3. viðgerð.

Orðfararin (M. A. Winther) mælti til at samtykja nevndaruppskotið.

Hetta varð samtykt.

Landistoðir.

3. viðgerð.

Orðfararin (M. A. Winther) mælti til at samtykkja tey uppskot sum nevndin var sameind um og annars uppskotini hjá fleirtalinum, sum minnitalið hevði skilt seg burtur úr.

Hesi uppskotini vóru samtykt utan uppskotið viðv. studningi til Fuglafirðingar til at bøta torvegin á Góðadali. Hetta varð minnitalsuppskotið samtykt.

Studningur til bryr.

3. viðgerð.

Orðfararin (M. A. Winther): Nevndin hevir býtt sag sundur í ein meirilutа og ein minnilutа; eg skal mæla til at stemma fyri meirilutans uppskoti.

O. Effersøe: Ogsaa her er et Mindretal, hvis Forslag jeg skal tillade mig at anbefale.

Í sak nr. 1—4 varð nevndaruppskotið samtykt.

Viðvíkjandi sak nr. 5 segði:

M. Samuelsen: Eg skal anhetalla at stemma fyri minnitalsuppskotinum. Eg skal á sama tíð benytta leiligheitina til at leggja tað eventuella ansvar, um nakar

skaði hondir, á teir, ið stomma fyri fleirtalsuppskotinum.

Fleirtalsuppskotið varð samtykt.

Í sak nr. 6 varð nevndaruppskotið samtykt.

Í sak nr. 7 varð fleirtalsuppskotið samtykt.

Hækkan av studningi til kommunulæknar.

3. viðgerð.

Orðforarin (R. Nielsen): Eg skal bert mæla til at stemma fyri nevndaruppskotinum.

Formaðurin: Jeg skal anbefala Ændringsforslaget.

J. J. Weihe: Eg kundi gjarna ynskt, at her fyrilá eitt skrivilsi frá Eiðis sókn, um hvussu teir stilla seg til hesa sak, men amtið hevir ainki skrivilsi fingið. Men nun kann vita so mikið, at teir fegnir vilja hava doktara, og útreishurnar vilja vera trykkjandi fyri kommununa, og enn meira um henda útreisla kemur aftrat. Eg skal tí biðja tingið, fyri at lætta byrðina fyri kommununi, at stenuna fyri uppskotinum frá formanninum.

M. A. Winther: Ja, tað er sum tingmaðurin úr Eysturoynni segði, at kommununar hava tikið sær eina tunga byrði uppá fyri at fáa læknar; hetta eru smáar kommunur við fáum og ikki múgvandi skattaydarum. Eg eri kortini ikki heilt fyri hesum, tí um vit geva hesum kommununum studning úr amtsrepartitiónsfondini, so er tað kortini bert ein lítil partur av Føroyum ið verður hjálptur á henda hátt, meðan hinir partarnir ainki fáa. Men so kann sigast aftur ímóti, at hinir partarnir verða hjálptir á annan háttt, við tað teir hava distriktlæknar, og tí, og út frá teirri motivering, Weihe gav, vil eg stemma fyri amtmansins broytingaruppskoti. Táið líknað verður til amtsrepartitiónsfondið, kann man betri leggja byrðurnar á teir partar, ið best orka at butala.

A. Samuelsen: Eg úttaladi meg so ógvuliga útførliga um hetta við 2. viðgerð, so og skal nú bert úttala, at eg havi rættuliga stórar beteinkiligheitir, men eg meini kortini ikki, at og kann lata vera við at stemma fyri broytingaruppskotinum. Táið tað verður lagsað um hinar sóknirnar, ið kanska verða forórættaðar her, so hava tær distriktslæknar, og til teirra skal einki betalast, hvorki fyri hús ella torv ella aðrar útreishur, sum kommununar hava til teirra doktarar. Tingmaðurin úr Vágum og eg tosaðu nógv um hetta igjár, og vit komu á samt um, at ein ógiftur maður, ið kemur her upp, honum krevst ikki 3000 kr. til flutningsútreishur, hann kann klára seg við minni. Og eg forstandi henda bovilling soleiðis, at teir fáa gottgjørt sínar útreishur til flutning og um tað ikki verður nýtt fult belop, so verður tað ikki úthetalt.

Orðforarin: Táið eg nú havi hoyrt allar teir, sum í hvila tikið hava úttalað seg um hetta, siga at teir ikki eru í tvivl um, at hetta er ein altfor stór byrða fyri kommununar, so haldi eg virkuliga tað er óforsvarligt av hesum monnum, at stemma fyri at leggja eina stóra byrðu á kommununar.

M. A. Winther: Til tað er at siga, at eitt ting kann vera so nógv vort, at man má anspora seg til tað ýtarsta fyri at fáa tað, sjálvt um tað kostar eitt nógso tungt tak. Soleiðis er við doktaranum á Sandi. Tingmaðurin í Vágum má ikki trúgva tí, at tað er av berari flottheit, at forstandarskapið hevur boðið sær til at taka við øllum hesum útreiðslum, nei, tað er eina og aleina tí at vit hava hildið okkum ómøguligt kunna forsvara yvirfyri befólkningimum ikki at gera hvat vit kundu. Tá talað var um at doktor Jónsson skuldi fara frá okkum kom ein trúgva av adressum frá fólki í Sandoy inn til forstandarskapið, hvar tey søgdu: Gevið doktaranum hægri grabialt. ikki bert garnuti, men hægri lon, so vit kunnu fáa hann at setast alfurt! Skuldu vit so nú, tá befólkningurin vil ofra, hvatið krevst, handla annarleiðis enn yvireinstemmandi við teirra hægstu ynskir? Eg eri í tvivl um, hvussu vítt og kann forsvara at leggja alla byrðuna á amtsrepartitiónsfondin av tí, at hetta berorir spesielt hesi einstoku plássini, men tá ein landspartur treingir til hjálp, so er tað ganska natúrligt, at tað samlaða landið tekur lut í útreiðslunum. Vit noydust at taka hetta tak saman við teimum plássum, ið treingja so harðliga til læknahjálp, ti doktarasparningurin verður ikki loystur á annan hátt yvirhovur, uttan at skaftur og logting stilla

seg vælviljandi við tilskoti. Sandingar hava ikki sett hetta forslag fram, men táið tað nú er frankomið, so síggi eg ikki annað at gera enn at stemma fyri tí.

Ordføraren: Tingmaðurin á Sandi sýnist at meina, at hann eftir samráð við komunissiónina má stemma fyri hesum forslagnum. Tað tekur hann feil í. Tað, sum tá fyrilá, var at staturin skuldi lata 3400 kr. til doktaralon móti, at tingið læt 1000 kr. og kommununrnar 300 leypar av torvi, umframt frí hús. Hetta, sum síðani er frankomið, betýðir so stórar byrður fyri kommununrnar, at hara tær mest valstandi hava ráð at ofra tað.

M. A. Winther: Tá tingmaðurin úr Miðvági heldur, at vit taka okkum ovstóra byrðu uppá, so átti hann ikki gjørt hana tyngri. Eg havi altið tonkt mær at hetta tilskot eisini skuldi koma Miðvág tilgóðar, um ein doktari kom í Vágum, at Miðvágs kommuna eisini vildi fáa sín part gottgjørdan av amtsfondini sum hinar.

Edw. Mortensen: Eg havi sitið í nevndini og verið við til at framsøta hetta uppskotið um, at løgtingið ikki skal betala 1000, men 500 kr. til flutningskostnaðin, tá hann kemur uppí 3000 kr. Av teimum 6000 kr. sum ásettar eru til fasta løknalon, skal staturin lata teir $^2/_3$, løgtingið $^1/_6$ og kommununrnar $^1/_6$. Út frá tí princípið er tað rimiligt, at løgtingið, tá tað ikki letur meir enn $^1/_6$ til lønina, heldur ikki letur meira enn $^1/_6$ av flutningskostnaðinum. Okkara forslag sigur einki um, at kommununrnar sknlu bera hin $^1/_6$ av hesum útreiðshum — hví skal doktarin ikki avhalda so fratt av sínum ferðaútgiftum sjálvur? Tað er tó ikki meir enn rimiligt....

Formaðurin: Soa kemur hann ikko.

Edw. Mortensen: Tá doktarar hava sitið her eini 6—7 ár við 6—7000 kr. um árið, so hava teir ráð til tað. Ministeriið hevur ikki sett treytir fyri løgtingið ella kommununrnar at betala flutningin, tað er antið sjálvt, sum hevur fyrisligið tað. Eftir brævinum av 2. septbr. setur ministeriið sum treytir fyri statstilskotið at forstandarskapið letur 1000 kr., frí hús og 400 leypar av torvi um árið, og at løgtingið letur 1000 kr. til hvønn doktaran. Av flutningskostnaðinum vil staturin goldgera $^2/_3$, men her eru ongar treytir settar til løgtingið ella kommununrnar, Men so sigur antið: »Man skal i den Anledning indstille, at

Lagtinget yder det ovennævnte Tilskud... samt $^1/_3$ af Flytningsomkostningerne, dog ikke udover 1000 Kr.« Hetta er altso nakað nýtt, sum antið skjýtur aftrat; ministeriið hevur ikki sett hesar treytirnar. Tá løgtingið nú átekur sær at betala tær 500 kr., má man siga, at tað stillar seg vælvilligt. Hvør ið skal útreiða hinar 500 kr., verður ein sak millum ministeriið og kommununrnar; tey mugu koma á samt um hvussu kommununrnar skulu lata hesar 500 kr. ella um tær skulu lata tær. Vit hava bara at siga, hvat løgtingið skal betala. Tað er ein nóg hørð byrða fyri kommununrnar at betala 1000 kr. umframt frí hús og 400 leypar av torvi. Hetta hava vit úttala í botonkninginum, tí vit ynskja at styðja og letta um kommununrnar.

Formaðurin: Grundlaget for dette Tilbud er Meddelelsen fra Ministeriet om Statens Villighed til at yde Tilskud paa de angivne Betingelser. Det er en Forudsætning, at Lagting og Forstanderskaber deltager saavel i Lønnen som i Flytningsomkostningerne. Ministeriets Forslag omfatter baade det ene og det andet.

M. A. Winther: Útvalgslimirnir hava givið okkum fullvissu um, at meiningin var tann, at kommununrnar komu at bera hesar 500 kr. av flutningskostnaðinum. Tað hava teir sjálvir sagt og tað máttu vit tí rokna við. Ella kunnu teir kannska garantera okkum doktara utan ferðaútreiðslur frá kommununni? So er tað gott, men tað var útrykkiliga sagt av komunissións-monnunum, tá teir vórtu her, at hetta verða tær treytirnar, tit mugu taka. Og vit hava tikið tær. Tann sum kemur viðurskiftini heima á Sandi, hvat doktararóðnr hevur at týða her, vil kunna fata, at tað naustan ikki er eitt ollur so stórt, at teir ikki vilja lata tað fyri at fáa doktara. At løknar eru fortrandi og krevja nakað nógv er ikki tilkomið hvorki ilag ella igjár, tað er nakað, sum vit vita fyri langtsíðani, at teir krevja hæði í posa og sekk. Teir hava altíð verið ovarstir við lønkravnm, teir vilja ikki nú standa í einum lógum lønklassa. Hetta hjálpir ikki at tosa um, vit sleppa ikki uttan um tað. Hevdu vit ikki tikið okkum nm reiggj heima á Sandi, so lógu vit í doktaraloysi enn; tað hevur vart nógleingi — í juni misti vit doktur Jónsson, nú er vónandi nýggjur løkni á veg til Sands.

Ordføreren: Eg lukti tingmaðurin á Sandi fordrar nakað nógv av útvalginum,

tá hann krevur, at vit skulu garantera Sandingum doktara. Men tað kundi verið, at vit kundu fingið doktarar biligari enn hvat danskir læknar forlanga. Í juli forlangaðu teir 5000, í september var tað blivið til 7000, í december verður tað natúrligvís 10,000 kr. Teir kunnu nærmast samanberast við hesar vælsignaðu jarðamøðurnar, sum krevja hægri løn ella streika vit! Eg haldi, man kann líkagott doyggja urliga á síni sóttarseng enn at geva seg undir slíkt. Vilja danskir læknar ikki koma hampuliga til Føroya, so kunnu vit væl fáa frá einum øðrum landi í Danavaldi, frá Íslandi. Vit eiga at ansa okkum, at vit ikki leypa út í eitt óført alt fyri eitt.

M. A. Winther: Forstandarskapið á Sandi let í apríl mánað kunngera í bløðunum, at doktaraplássið í Sandoy var opið frá 15. juli, og at lønin var garanterað 5000 kr. og frí hús, góð hús. Har meldaði seg eingin, tó at freystin var sett so long. Tað vísti seg til fullnar, at hesar 5000 kr. við fríum húsi ikki var nakar gloypubiti fyri danskar lækuar.

A. Samuelsen: Tá eg á einum nevndarmøti lærdi hesa sak at kenna, var tað av munnligari frásøgn. Tað var stillað sum betingilsi av ministeriinum viðvíkjandi ferðastyrk til hesar doktarar, at vit lata triðjungin. Mortonsen sigur, at hetta ikki var stillað sum betingilsi. Men so nýtast vit ikki at stemma fyri nevndaruppskotinum. Um ministerið vil betala ferðastyrkin upp til 2000 kr., so er hetta gott tilboð til at fáa doktara. Mín meining er, at doktarnir fáa tilstrekkiligt gjøgnum hetta uppskot, burtsæð frá hesum ferðastyrkinum. Men vit noyðast at geva eftir fyri teimum treytum sum doktararnir seta. Tí annars fáa vit teir ikki. Teir fyriskriva treytirnar og vit noyðast at taka undir.

Edw. Mortensen: Tað er ríksdagurin og ikki sunnheitsstýrið, sum betalir. Skulu vit fíra hvørja ferð sunnheitsstýrið setur krøv?

A. Samuelsen: Nei, tá tað drejar seg um bevilling, so betalir ikki sunnheitsstýrið. Men tá talan er um at fáa doktara, so noyðast vit at taka hensýn til sunnheitsstýrið og doktarafeiningina. Teir ráða fyri doktarunum. Í eygablikki liggur spurningurin frá regeringini og ikki frá ríksdegimum, sum Mortensen segði. Um ministeriið hevur fingið tilsogn frá finansnevndini, so hevur ministerlið sagt umtrent, hvat vilkor tað krevur og fyriskrivar. Mortensen sigir, at kannsko ríkadagurin vil fráfalla tað, sum ministarin krevur hor. Tað vita vit ikki. Men tað er møguligt. Vit í nevndini vóna, at man vil fráfalla ein part av tí, neuliga tað betingilsi, at kommununrnar sum tilkot skulu lata 1000 kr. umfram tað sum doktarin tjenar í praksis. Men um vit vilja vera sikrir í eygablikkinum, skulu vit gaoga inn á treytirnar og ikki sjálvir leggja treytir á. Ministeriið væntar, at vit lata tær 1000 kr. sum tað krevur.

M. A. Winther: Spurningurin er soleiðis, at vil man hava doktara til 1. oktbr., so má mann ganga undir treytirnar. Tað mátti man heldur enn at lata plássið liggja í doktaraloysi og enda við tí, at man ikki vinnur fram. R. Nielsen sigur, at nú krevja læknarnir 7000 kr. árliga. Táið longri líður út, kannske í december, koma teir so og krevja 9000. So hava vit á Sandi sligið til í góðari tíð. Eg haldi, at vit her hava verið frammanfyri onnur pláss. Vit hava sligið til utan at hava hugsað okkum ov leingi um; tí vit vistu sum var at vit sluppu ikki utan um hesar góðu menn í sunnheitstýrinum. Og nú siglir doktarin hjá okkum úr Koypmannahavn til Føroya.

N. Debess: Tá hendan sak var til 2. viðgerð úttalaði eg meg í rættning av tí uppskoti, sum fyrilá frá nevndini, at tingið skuldi lata 500 kr. Eg helt hetta vera í kontakt við ta støðu, sum amtmaðurin hevur tikið framman undan. Í sanatoriinevndini var komið ásamt um, at tingið skuldi lata 3000 kr. og Havnar kommuna líka nógv, meðan staturin skuldi lata 12,000 kr. Og amtmaðurin helt, at tað var hóskandi at skipa tað soleiðis. Og tá haldi eg, at hetta uppskotið frá nevndini eisini er væl hóskandi. Annars betrakti eg hesa sak sum eitt eksperiment. Sakin er løvst fyri Sands viðkomandi. Men vit vita ikki, um tað kann eydnast at fáa lukuar í framtíðini uppá slík betingilsir; tí frá 4000 kr. í garanti er tað nú hækkað upp til 6000 kr. í garanti, umframt frítt hús, frítt brenni og tað luknin kann fortjena. Tá man forhandlaði um embati í Havn, framhevaði Hemp, at um garantiin varð uppsett til 7000 kr., so fingu vit danskar læknar higar. Tá so tað kemur aftrat, at tingið tekur lut í ferðafrítreiðslunum við 500 kr. og kommunan við líka so nógvum peningi, so skuldi sakin vera uppløgd. Men tó síggja vit, at hettar

batar einki. Tí haldi eg, at hetta at bjóða 5000 kr. má vera eitt experiment.

Edw. Mortensen: Tá eg var við at seta uppskot í nevndini, gekk eg út frá at ministarin ikki hevði lagt tær treytir á tingið at tað skal betala $^1/_3$ av ferðaútreishunum hjá løknunum við 1000 kr. Nú eri eg ikki klárur í hesum longur, tí amtmaðurin sigir, at hetta vóru álíkavæl treytir, sum ministeriið setur. Bert nú telegrammið ikki er so óklart, at sakin er komin skeivt framm. Tá lækoakommissiónin var í Føroyum, gekk hon út frá, at kommunan skuldi garantera, men ikki skjóta nakað nýtt til. Eg kann slutta meg til Debess, at kommununrnar kundu royna hetta. Winther sagði, at man fekk ikki doktara utan at betingilsini vóru accepterað. Men betingilsini eru ikki accepterað og doktari kemur tó nú til Sands.

A. Samuelsen: Vit eiga ikki at stemma fyri nevndaruppskotinum uppá 5000 kr. Eru vit fyrst komnir inn á tað, so sleppa vit ikki frá tí, og vit fáa tá aldri lækna til Føroya utan vit betala hetta her. Eg hoyri, at tað skal koma ein doktari til Sandoyar; tað má vera tað, ið sipast til, tá eg las í Politiken, sat Læge Alstrup var udsat til at overtage Lægestillingen paa Færøerne, tað er altso Sandoy, ið har meinast við. Um Sandoyingar hava fingið doktara uppá hesi rættuliga ringu vilkor, sum her hevir verið tala um, so kunnu væl aðrar kommunur eisini fáa ein doktara sum nú er, men tað kann jú vera, at teir menn, ið hava antikið doktaran, hava framstillað fyrið honum, at hann vil kunna fáa hetta flutningsgjald, táið tað verður bevilgað. At fara og experimentera við hesum, sum N. Debess fyrisær, kunnu vit aldeilis ikki inláta okkum uppá.

M. A. Winther: Doktarin, ið komn skal til Sandoyar, livir sikkurt í tí vón, at hetta forhold vil ordnast, soleiðis sum hon er borið upp á mál, og at hann vil fáa sínar flutningsútreishur góðgjørdar. Um man ikki vil stemma fyri formansins uppskoti, haldi eg við sýslumanni Samuelsen, at so mega vit heldur lata vera at stemma fyri hinum, so spurningurin stendur opin. Eg meini, at tað loysir seg ikki at skarva hetta belop, antin skal tað vera egg ella ungi; so eg vil ikki ganga við til at býta helftina til amtsrepartitiónsfondina og helftina til kommunurnar.

Edw. Mortensen: Um tað er almindiligur stemningur fyri ti skal eg einki hava ímoti, ikki at stemma fyri nakrari útreishu fyri løgtingi til hetta fyrimál.

Broytingaruppskotið varð fyrst samtykt.

Síðani varð tað soleiðis broytta uppskot samtykt.

Læknaembætið í Vágum.

3. viðgerð.

Orðforarin (R. Niclasen): Eg skal bert mæla til, at nevndaruppskotið verður samtykt.

Edw. Mortensen: Tað kemst mær fyri at vera nakað skeivt, at vit burt fyrisláa 500 kr. í flutningsgjald til læknan í Vágum, men 1000 kr. til hinar. Tað er ov seint nú at framseta broytingaruppskot, men eg forbehaldi mær at meina, at hetta má kunna hæðkast næsta ár, um teir fáa nakran doktara til Vágar í ár, og hann kann so fáa hetta góðgjort.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Studningur til arbeiðisleysar fiskimenn.

2. viðgerð.

Orðforarin (R. Rasmussen) greiddi frá nevndarálitinum meirihlutans.

A. Samuelsen greiddi frá álitinum og lógaruppskoti minnilutans.

Eg vil ikki koma í stríð við orðforaran fyri fleirtalinum í nevndini, men nevndin kundi hava gjørt eitt betri arbeiði, um mann vildi inn á hendan veg. Eg eri fegin fyri hjálp til at gera uppskotið hjá okkum betri; tí tað hevur manglir. Um orðforarin hevði hjálpt okkum, so kundi hlíva betur burtur úr. Tað sum orðforarin segði, týðir á, at tað er brúk fyri einari lóg sum hesi. Orðforarin viðgekk, at mangur maður trongdi til studning. Men skal tað verða givin studningur, so skal ikki bíðast, tí, meðan grasið gror ..... sum tað sigst. Við tí tanka, R. Rasmussen helt fram, sendir tað seg fyri hann at ganga saman

við okkum, og tá vildi vera grund til at trúgva, at vit kundu fáa nakað burtur úr tí her í tinginum og viðari úti. Hendan sak er so vanskilig, at um tingið býtir seg sundir, so er ikki væntandi at fáa nógv burtur úr henni. Og um hon fellur, so noyðast Føroyingar at bíða til R. Rasmussen um eitt ella fleiri ár hevur funderað nakað annað. Vit fyrisláa í okkara uppskoti, at hvør familiuforsyrgjari skal fáa 90 kr. um mánaðin og annars vist fyri hvørt barn, men tá skal tað verða trekt frá sum hann hevur fortjent um mánaðin. Tað er ein vanskiligur spurningur at fyrisláa, at man í almindiligheit skal fáa undirstøttilsi; vit royna tó at begrensa tað og siga, at tílíkt undirstøttilsi ikki fæst, utan at man hevur roynt at arbeiða og taka deil í fiskarínum. Eg skal eisini siga, at eg haldi ikki, at tað skal forstandast so, at tá til dømis ein fiskari á Viðareiði ikki kann fáa arbeiði utan at hann fer suður til Hvalbiar, so skal hann ikki vera plikttugur at fara so langt. Tá hann ikki fær arbeiði í nærheitini, so hevur hann uppfylt betingilsini til at fáa undirstøttilsi. Eg vil biðja tingið taka væl móti hesum uppskoti. Og um onkur meinar, at tað kann bøtast um tað, so vildu vit í minnitalinum vera takksamir fyri tað. Tí vit halda, at eitt tílíkt uppskot kann ongantíð vera ov væl funderað. Og hetta uppskotið krevur allan tann tilsluttning, sum tingið kann geva. Eg anbefalli uppskotið frá minnitalinum.

R. Rasmussen: Orðførarin fyri minnilutinum úttalaði, at uppskotið frá teimum skal siggjast sum ein mynsturlóg. Eg veit ikki, hvat ið forstendust við mynsturlóg. Tað skal væl vera at høvuðsprinsíppini í henni skulu takast til fyribílæti. Høvuðsprinsippið í hesum uppskoti er í § 3, sum gongur út uppá at siga, hvør ið er berettigaður til undirstøttilsi eftir hesi lóg. Og her stendur, at viðkomandi ikki skal hava forsomt at fara til útróðrar, tá líkindi eru til tess. Tað verður vanskiligt at avgera nær viðkomandi forsomir at fara til útróðrar og ikki forsomir tað. Tað er øllum kunnugt, at í útróðrarbygdum eru altíð bátar, sum leggja meiri til enn aðrir. Og teir, sum meiri leggja til, fáa meiri. Her skal sikrast monnum, at teir skulu hava inntøku, sum er minst 90 kr. um mánaðin. Nú kann tað vera, at teir bátar, sum leggja meiri til, fáa meiri enn 90 kr. Annars er hetta lítið at føða familiu við. Men ein og tveir bátar kunnu koma upp um hetta, meðan allir hinir vera niðanfyri. Og teir, sum leggja meiri til, kunnu hava betri bátar og betri mannskap at redda seg úr vanda enn hinir. Tað er ringt at døma í hesum. Hetta er ikki nakað gott mynstur, sum mynsturlóg betraktað. Men tað er nakað annað, sum og í hesum viðfangi vil peika á. Og tað er, at eg haldi ikki, at vit Føroyingar í teimum tíðum vit liva í, hava moralskan rætt til at disponera so at okkara størstu skattaýtarar skulu aldeilis sleppa undan byrðunum til Føroyingar, sum ikki klára seg undir dýrtíðunum. Her sum aðrastaðnis er hópur av monnum, sum ikki eru arbeiðarar, men sum hava fortjent stórar pengar undir krígstíðini. Hví skulu teir sleppa undan byrðunum? Tað er ikki moralskt rætt. Orðførarin fyri minnitalinum sigir, at vit kundu havt hjálpt teimum við at gera teirra uppskot betri. Nei, ikki so væl. Tí eg haldi, at tað fyriliggur ikki tilstrekkiligt grundarlag at byggja á fyri at fáa uppskotið soleiðis fram, sum vit vildu havt tað. Vit máttu fyrst betri kenna formúu- og inntøkuviðurskiftini í landinum. Um vit høvdu havt skattalógina, sum krevur, at maður skyldar at uppgeva formúu og inntøku, so høvdu vit nú vita, hvar tær stóru formúur og inntøkur vóru. Men tað er ikki. Og vit kunnu ikki taka eftir teimum pengunum. Vit hava í tí farnu tíð ikki farið so avstað, at vit hava tað tilstrekkiliga grundarlagið til at byggja eina slíka lóg á. Eg meini ikki, at vit sjálvir kundu borið alla byrðuna, men tó ein stóran part av henni. Og tað hevði verið moralskt rætt. Men hetta ringa skilið hevur gjørt, at fleirtalið ikki hevur følt seg sikran í at taka eitt tílíkt arbeiði upp. Vit kunnu ikki hjálpa minnitalinum, tí vit meina ikki, at staturin skal bera alla byrðuna, sum eykst av slíkari lóg. Tí andin í hesum uppskoti er, at hetta skal ikki einans gjalda fyri ta dýrtíð, sum kríggið hevur fort við sær, men fyri dýrtíð yvirhøvur. Uppskotið kann í og for seg vera rætt, men vit meina, at tað má grundast annarleiðis enn hetta.

A. Samuelsen: Orðførarin segði, at høvuðsprincip okkara stóð í § 3. Tað er ikki rætt; har eru fastsett nakrar betingilsir fyri at man kann fáa studning. Orðførarin kallar hetta eina dýrtíðarlóg, tað er heldur ikki rætt; hetta er ein lóg, ið tekur sikti uppá at bøta um arbeiðislovsi, ikki hjá útróðrarmonnum, men hjá arbeiðarum ið eru líkastillaðir við teir. Orðførarin sigir, at § 3 er ring at fortolka; ein maður skal fyri at fáa studning gutgera, at hann ikki hevir forsomt at fara á flot táið farandi er ella ikki hevir tikið annað arbeiði, ið

býðst honum. Vanskeligheitirnar eru ikki so stórar sum orðførarín avmálar; hann sigir, at um menn fara til útróðrar við lívsfáru ein dag, skulu teir einki fáa ið sita heima; sovorðið kann man siga, táið man situr og spekulerar í sínari stovu ella á einum kontóri, men farstandarskapini úti um á bygd, tey kenna forholdini, og tey vita nær tað er útróðrarveður, og um kanska onkur bátur fer ein dag í óvandaveðri og kemur aftur við neyð og deyð, so vilja teir ikki tí halda, at hinir hava forsømt ein útróðrardag. Hetta er vanskeligt, men vanskeligheitirnar eru til fyri at yvirvinnast. Eg haldi at R. Rasmussen legði sær eina við at finna vanskeligheitirnar í hesi sak; hann vildi betur gagnað teim føroysku fiskarunum við at royna at fáa tað besta burtur úr hesum. R. Rasmussen sigir, at hetta er einki mynstur, nei, tað er eitt forsøk; hetta skal vísa lóggevarunum niðri, at um nakað skal gerast fyri føroyskar fiskarar og arbeiðsmenn, sum teir skulu hava gagn av, so má tað gerast umtrent uppá hendan máta. R. Rasmussen segði, at eingin maður kundi føða konu og børn við 90 kr. um mánaðin; nei, men eg havi behildið talið frá tí donsku lógini, og ikki sett studningin hægri enn teir hava hann niðri í kongaríkinum; tað verður nú eitt sindur meira enn 90 kr. fyri ein giftan mann, hann vil fáa 110 kr., um hann hevir børn; um R. Rasmussens uppskot verður samtykt fær hann einki. Eitt annað, R. Rasmusson nevndi, var, at fiskarar fyri at fáa studning ikki mega hava meira enn 5000 kr. í formúgu; og trúgvi ikki tað standur í lógini, men at formúgan kann vera upp í 10,000. Eg eri kaldur av, at orðførarín ikki hevir syrgt fyri, at hvør okkara hevir fingið eitt eintak — nú vil eg oinaførð tosa føroyskt, soleiðis kalla teir tað nú — eitt eintak av betonkningini. Orðførarín tosaði nakað, ið fyri so víst var gott, at nógvir menn hava tjent hópin av pongum undir krígnum, og tað er skeivt, at teir sleppa undan at betala teirra andoil til at bøta um, at aðrir menn líða neyð. Tað er ikki beint at siga, at hesir menn sleppa frá at lata pengar til at bøta um dýrtíðina, okkara dýrtíðarlóg stillar tó stór krav til teir menn, ið hava tjent nógvar pengar. Um kommunustýrini ikki kenytta lógina, so hesir menn koma at betala, verður tað ikki løgtingsins skyld. R. Rasmusser framheldur, at vit kenna ikki, hvat ið fiskararnir tjena; notupp tað, at vit ikki kenna inntøkurnar, er ein grund til at taka hesa bráfongis lóg, só kunnu vit kenna til at fáa allar hesar upplýsingar. Um hann meinar tað, at vit skulu koma til at fáa eina lóg um hetta, so haldi eg, hann absolut má sluttа seg til okkara, fyri av hesi lóg at fáa tær upplýsingar um inntøkur, hon fer at geva, og so fáa ta góðu lóg, hann vil hava. Tað er ikki rætt at lata fiskarar og arbeiðarar liggja við ongum meðan vit leita eftir upplýsingum. Her er ikki tala um at skapa føroyskum fiskarum ein serstilling, teir eru danskir statsborgarar eins væl og fiskararnir á Vestkystinum og arbeiðararnir í Keypmannahavn, hví skulu teir so ikki benytta sama atgongd sum hinir til at fáa studning úr statskassanum? Tað kann vera, at arbeiðararnir niðri ikki fáa studning utan teir eru í arbeiðisloysiskassum, men fiskararnir fáa í hvussu er studning utan at vera í nakrari foreining og utan at lata eitt oyra sjálvir til arbeiðisloysiskassar. Sjálvt um seinasti vetur var betri enn vanligt, vóru tó nógv, ið ikki høvdu nóg mikið og tað var tí keðiligt, at tey ikki fingu part í, hvat staturin hevir givið. Eg ynski veturin so góðan, at lógin verður yvirflødig, men um veðrið verður lika so ringt sum í summar, so verður trongt hjá mongum. Eg meini ikki, sum R. Rasmussen heldur, at statskassin skal bera tað heila, men so leingi vit eru danskir statsborgarar, so hava vit fullan rætt til at krevja úr felagskassanum. Hetta er eingin dýrtíðarlóg, men ein arbeiðisloysislóg sum tann, teir hava niðri, hon er kanska ikki so fordeilaktig sum tann niðri. R. Rasmussen segði, at tá teir fáa tað í lag, sum hansara partí ynskir, tá skal tað offentliga yvirtaka forskelliga drift og handil og av tí yvirskoti betala til sovorðnar lógir sum hesa. Eg vil spyrja, um tað var fyri alt fløirtalið, hann segði hetta, tí eg trúði, at har vóru teir innanfyri ið ynsktu fríhandil. Hatta punktið hevir ikki verið hildið fram í útvalginum, og eg má siga, at nær dámar ikki handa tanka; vit hava haft monopolhandil undir krígnum, og eg hopi, at vit skjótt kunnu uppheva hann; vit mega fáa upphevað allar inskrenkningar. Fólkið fær dýrari vøru, við tað, at keypmennirnir ikki frítt kunnu innføra vøru. Hetta verður í hvussu er vanskoligt at seta í verk.

N. P. úr Koneyj: Tað er eydvitað, at tá talan er um eitt lógforslag, sum sigur til at bøta um livikorini hjá tí meinigu menninum, arbeiðsmannaitnum og fiskimannunum í Føroyum, so er tað uppá forhond givið, at teir allarflestu tingmenn eru samsintir í tí at taka undir við hesum tanka-

um; tað er týðiligt, at í eini slíkari sak vilja teir flestu siga: Sjálvfylgjuliga vilja vit vera við til tað. Men hann, ið hevur fingist eitt sindur við slíkt arbeiði, kann heldur ikki forsvara bara at tosa uppílag og ikki vísa á tær vanskuligheitir, sum oru við at loysa ein sovorðnan spurning, so at hann í royndum kann verða teimum til bata, sum hann er ætlaður at hjálpa. Vit mugu tí alt fyri eitt gera okkum klárt um henda lóg skal verða stovnað á tí grundarlagi, sum arbeiðsloysiskassarnir niðri í Danmark byggja á, ella vit ætla at ganga forbí tað princippp. Tað hevur orðforarin fyri minnitalinum ikki greitt frá. Sum vit vita veita arbeiðsloysiskassarnir stuðning til limir, fólk, sum standa í organisatiónini og betala sítt kontingent, tá tey kunnu prógva at tey eru arbeiðsleys og ikki kunnu fáa arbeiði. Eftir hesum uppskoti skulu allir arbeiðsmenn og fiskimenn, sum ætlast at vera súbsmidlaðirs, fáa stuðning utan at vera í nøkrum felag ella betalu nakað kontingent. Hetta eru heilt onnur princippir enn tey, sum galdandi eru niðri í Danmark. Teir donsku arbeiðsloysiskassarnir eru grundaðir á tey sonnu princippir, sum galda fyri sjúkrakassar. Ígin slíkur kassi verður har stýðjaður av tí offentliga, uttin av kommununum ella í ollum tilfeldi av statinum. Sjálvt um her kom eitt sovorðið felag ífag, hvar fiskimenn kundu sikra seg móti arbeiðsloysi, tá uppiloga var, kundi tað verið nógso torført kortini at veitt stuðning á rættvísan hátt. Teir, sum hava sitið í sjúkrakossum vita, hvussu vanskuligt tað t. d. kann vera at ætla um dagpengar, og tað er tó yvirhovur kanska til seingjarliggjandi fólk. Her skuldi mann í hvørjum tilfeldi ætla um, uttin tað hevði verið favrandi til sjós tann ella teir ávisu dagar. Orðforarin sigur, at tað kunnu forstandarskapini nokk klára — ja tað er so lætt at sigu. Ringt kann tað ofta og lítt vera hjá forstandarskapinum sum er, at taka avgerðsi um eitt og annað, sum fyri felkur, men skulu teir eisini geva sítt navn uppá, um tað hevur verið sjófarandi teir og teir dagar, so kvíði eg fyri, at tey flestu forstandarskapir siga seg undan. Og har kann blíva so mangt annað at ætla um hjá teimum. Í einum bygdalag eru bátarnar heima ein dagin, ikki tí tað júst er óveður, men tí teir einki ogn hovdu, í einum øðrum bygdalag, har teir hovdu syrgt sær fyri agni frammanundan, eru bátarnir úti hendu sama dag. Skal nú forstandarskapið ætla um hendu agnspurningin eisini? Og soleiðis kann ein umstøndigheitin fyri og onnur eftir gripa óforvarandi inn. Tí er tað okkara plikt at síggja teir vansar, sum kunnu vera fyri eini slíkari lóg og ikki bara tveita eitt slíkt uppskot fram og siga, at hetta er gott fyri fátøkrafólk. Ja harragud, tað kunnu øll vera einig um. Men bara at poika á, at so og so nógv fáa arbeiðsmenn og fiskimenn í Danmark og ikki samtíðis siga frá at teir standa saman í felag og gjalda sítt limagjald fyri at kunna fáa lunda stuðning, men tvørtímóti ugga seg við at tað behova vit ikki, vit skuhu bara krevja — *tað* er ein skeivur máti. Skuhu vit hava eina arbeiðsloysislóg, so mugu vit hava organiseraðar arbeiðsloysiskassar, har limirnir betala sítt kontingent. Antin mugu vit lata vera at fáast við nakað slíkt ella eisini sláa inn uppá tey sonnu princippir, sum her eru galdandi niðri í Danmark.

Th. M. Strom: Sum eg segði við 1. viðgerð kann eg ikki vera við til at upptaka nakað nýtt spursmál, fyrrenn vit vita um úrslitið úr tí lógini, sum galt fyri 1917–18, og eg meini vit eiga at halda fast uppá, at teir fiskarar, sum hava innigivið skemtair, koma í betraktning, tí tann veturin var sera ringur í Føroyum. Eg vil ikki ganga við til at viðtaka, at tær lógir, sum gjørdar oru seinri, verða settar í kraft her í Føroyum, tí oftar teimum kann studningur ikki gevast utan at atvoldin til arbeiðsloysi skyldast krígssituatiónini; teir Føroyingar, sum seinasta ár róðu út uppi undir Íslandi, tjentu jú ógviliga lítið, men teir kunnu altso ikki koma í betraktning eftir lógini. Andrass Sámalsson hevdar enn sum áður at vit eru javnstillaðir við aðrar danskar statsborgarar og kunnu gera tey sonnu krav sum teir. Tað hevur ikki víst seg við hesi lógini; meðan teir donsku fiskararnir longu fingu sínar pengar í mars 1918 hava Føroyingar ikki fingið eitt øvra enn og tað sær kanska illa út fyri at teir fáa nakað.

Orðforarin: Tað hevur verið á máli, um hetta lóguppskot var at betrakta sum ein dýrtíðarlóg ella ein arbeiðsloysislóg. Ég havi ikki sagt, at tað er ein dýrtíðarlóg heimanvegin, men at tað íhvussu er má kallast ein arbeiðsloysislóg grundað uppá dýrtíðina, framgongur skiliga av tí, sum nimnitalið sigur í álitinum. Til allar tíðir hevur verið arbeiðsloysi millum føroyskar fiskimenn og arbeiðsmenn eins og nú. Men fyrr kunnu ein klára seg so nokuhunda, um tað bleiv uppiloga eina tíð, tí tá vóru voruprísirnir somikið lágir at fortjenastan rokk til veturin; nú eru viðurskiftini

øðrvísi av tí at arbeiðsfortjenastan ikki forslær longur; prísirnir eru farnir uppí tað 3—4—5 dupulta. Tað er rætt nokk, og tað merkir til fullnar at henda lóg er ein arbeiðsloysislóg, grundað serliga uppá tað núverandi dýrtíð. Merkiligt nokk tykist ordførarin ikki vilja vita av, at lógin skal hava nakað við dýrtíðina at gera, men tá verður tað enn meira óforstáiligt og fløkt tað heila. Vit mugu so einans halda okkum til arbeiðsloysisspurningin og gera tað greitt fyri statsmyndigheitunum at her er slíkt arbeiðsloysi í Føroyum. Tað kann kanska falla vanskuligt at geva greidligar, vælgrundaðar upplýsningar til prógv fyri tí. Sum allir vita er her trot uppá arbeiðskraft fyri privatfólk; um man bara vil hava ein mann til at skera torv um várið olla arbeiða uppá torv nm sumarið, so gongur tað ógviliga trupult at fáa fatur í ein sovorðnan mann. Tað er slík tift um arbeiðsfólk, at tað ikki er møguligt at framdriva tað arbeiðskraft, sum noyðug er til privat arbeiði, enn verri til aðrar støri fyritøkur sum t. d. koladriftina í Suðroy; har hevur man verið noyddur at fáa arbeiðskraft útanífrá. Tair bovillingar, sum í 1917 vóru givnir til vegir, og sum deils vóru at rokna sum dýrtíðarforanstaltningar, bliva ikki nýttir; tað var eingin trongd til tað arbeiðið, tað var altíð annað at gera, sum lønti seg betri. Henda dýrtíðarhjálpin var ikki nýtt. Yvirhøvur má tað tí sigast fyri verandi tíð at arbeiðsloysi er ikki tilstøðar í Føroyum. Harímóti er tað í einstøkum bygdalogum tíðir á árinum, tá tað væl kann imntreffa at ikki arbeiði er fyri hond. Hetta skulu ný myndigheitirnar niðri ætla um og tær vilja so kanna eftir hvussu avstandurin er millum tey ymsu plássini í Føroyum, um hann kanuska ikki ur longri enn so, at arbeiðskraftin koen flytast aftur og fram. Tær vilja tá skjótt síggja, at her er ógviliga stutt imillum til tað og vit kenna jú eisini væl, at menn hava sokt og sokja sær arbeiði í øðrum bygdum bæði á vetri og sumri. Við góðum samferðsilsmidlum kann ein slíkur flutningur væl kunna ganga fyri seg, so her ikki verður tala um arbeiðsloysi. Tað fer tí at falla vanskuligt fyri okkum at fora hegrundilsi fyri okkara trongd til eina reina arbeiðsloysislóg, tá vit heilt skulu síggja burtfrá dýrtíðini. Men tað er skiligt at hetta lóguppskotið er fororsakað av dýrtíðini, tað sæst av tí fyrsta paragrafini, har talan er um at ýta dyrtíðarundirstøttilsið til óbemidlaðar fiskarar olla arbeiðsmenn. Í grundini er hetta ein dýrtíðarlóg formað sum ein arbeiðsloysislóg — tað er nokk tað rætta at siga. Her trúgvi eg, at ein virkulig dýrtíðarlóg hevði gjørt betri nytta og tí vil eg ikki ganga við til hetta tiltakið. Sum eg havi sagt fyrr vildi eg gjarna gingið við til at skipa soleiðis fyri her á landi at tað offentliga yvirtók produktiónsmidlarnar, drift og handil, og eg veit, at tað eru fleiri í báðum partíum samsintir við mær í hesum.

Eg sigi tað fyri meg sjálvan, og fleiri av tingsins sjálvstýris og sambandsmonnum eru samsintir við meg í at tað kundi vera heldugt fyri okkum at hava offentliga drift ella at tað offentliga átti produktionsmidlarnar. Hettar er sami tankin, sum nú er nógv frammi í útlondum og nógva staðnis kemur til virkuligheit. Tess meiri eg síggi uppá hetta uppskotið frá minnitalinum tess minni síggi eg gavnligheitina av tí, og kanska er hetta uppskotið heldur ikki annað enn agn til veljararnar.

A. Samuelsen: Tað kann líkjast ordføraranum at tveita út at okkara uppskot er agn fyri veljararnar. Hann er slíkur maður, sum ikki hugsar annað enn ilt. Vit hava her frá regeringini fingið uppskot at úttala okkum um, sum er gott fyri okkara fólk. Og so liggur tað fremst fyri hjá hesum manni at siga, at tað er agitatiónsstoff. Um R. Rasmussen ikki fyri veljarunum kann forsvara sína støðu, so verður tað hansara suk. Hann gor einki annað enn at finna virkuligar vanskuligheitir og tonktar vanskuligheitir fyri at støgga hesum. Tá Konoy spyr um prinsippið fyri hesum uppskoti, so er tað at finna í motivunum til uppskoti. Forbíleti til hetta er frá lógini um arbeiðsleysar fiskarar. Vit vilja, at tað skal galda aðrar enn fiskarar, men hesir eru tó teir flestu. Men arbeiðsmenn kundu treingja líka mikið til studning sum teir illa stillaðu fiskararnir. Og eg trúgvi ikki, at tað vil hava stóran finantsiellan fýlning fyri statskassan, um hesir koma við. Tað er hetta prinsippið, sum vit hava lagt til grund. Kanska tað ikki er konsekvent, at vit hava tikið aðrar við enn fiskarar. Tað annað er, at vit hava sagt, at arbeiðsloysi ikki bara skal skyldast kriggimum. Tað er hovuðprinsippið. Og tá hava vit fingið tað donskat lógina anvendiliga her. Tað er rætt, at tað kann blíva vanskiligt fyri forstandarskapið at kontrollera í hesum viðurskiftum. Men vanskiligheitirnar eru til fyri at yvirvinnast. Vetrarmánaðirnar eru útróðradagarnir ikki so nógvir, og tað vil tí vera latt fyri kommununum at skjonna um útróðradagarnar í december og januar.

Men sakin er so viktug, at tað má gerast. Eg vil siga til Strøm, at tað ikki er ávist enn at vit ikki hava javnan rætt við Danskarnar. Man skal ikki siga, at vit eru statsborgarar av 2. klassa. Um tað vóru tveir klassar av donskum borgarum, so vóru vit klassi 1 a og hinir klassi 1 b. Um Strøm yvirveiar oll forhold, so vil hann samna hetta. Tá R. Rasmussen meinar, at okkara uppskot er agitasjón, so er hoployst at drøfta sakina sakliga við hann. Hann sigir, at hetta lóguppskotið er til at avhjálpa arbeiðsloysina, men er eisini ein dýrtíðarlóg. Tað er undarligt av honum at siga hetta fyri tað orðið dýrtíð er nevnt í motivunum til uppskotið. Vit hava funderað hesa lóg, sum eina arbeiðsloysislóg. Og arbeiðsleysheitin verður so mikið meiri pínlig tí at tað er dýrtíð. Men R Rasmussen hevur lisið motivini sum ein annar illsintur maður plagar at lesa halgu hók. Hann erkennir, at tað er arbeiðsloysi, men sigir nú, at tað manglar arbeiðskraft. Um summarið trýtur arbeiðskraft, men ikki um veturin. Um tað eydnast R. Rasmussen við hesum at bereiða sakini vanskiligheitir, veit eg ikki. Men hansara útgreinir eru skikkað til tað. Tá orðførarin sigir, at tað er einki arbeiðsloysi utan í einstøkum bygdum, so eru hesi útgreinir eitt gott dømi uppá at tað er hensiktin hjá R. Rasmussen at bereiða uppskotinum hjá okkum vanskiligheitir. Hann sigur, at viðvíkjandi viðurskiftum yvirhovur so manglar arbeiðskraft. Men hvat hjálpir tað t. d. einum manni á Viðareiði, at hann kann fáa arbeiði í Suðroy. R. Rasmusson vil væl ikki sign til Fugloyingar: at fara tit ikki til Sumbiar at fáa tykkum arbeiði, so doyggi tit bara í svolti. Vit hava já ikki teir samferðsluvegir, sum teir hava aðrastaðnis. Niðri fáa arbeiðsmenn undirstøttilsi, um teir ikki kunnu fáa arbeiði í teirra fakí. Men vit sum arbeiða alt møguligt — fyri okkum skipa vit tað annarleiðis. R. Rasmussen sigir, at dýrtíðarlógin vildi gjørt líka nógva nyttu sum londan; men hann er tó ikki komin við nøkrum uppskoti um tað. Tað kann ikki hjálpa teimum mongum sum vilja hava stuðning í vetur at bíða eftir upplýsingum til eina betri lóg. So sigir R. Rasmusson, at tað vildi vera heldugt. um tað ollentliga yvirtók handil og aðra drift. Her batar lítið at koma inn á problemur, sum tað eru deildar meiningar um. Og tað hevði verið leingi til vit komu á botn við hesum, um vit skuldu diskuterað tað her. Og tað viðkemur heldur ikki hesi sak. Her stilla vit framm praktiskar spurningar. Her hjálpir ikki at bíða; til mesta ár kann gott skaði vera skeldur. Eg vil ikki forloingja diskussiónina; eg kann ikki síggja, at tað, sum er framfort ímóti uppskotinum, kann gera tað ómøguligt at gjognumfora tað. Vit eiga at royna at fáa tað til lóg. Men tað er sjálvandi eitt betingilsi fyri at tað yvirhovur kann verða framt aðrastaðni, at tað verður samtykt nøkulunda einstemmiga á løgtingi.

Th. M. Strøm: Eg veit ikki, um eg ikki kann samtykkja A. Samuelsons orð í tí, at Føroyingar eru statsborgarar av oðrum klassa; tí tann fyrsta lógin varð praktiserað har niðri í Danmark, men her uppi skuldi tað bíðast fyri at siggja, hvussu nógv fiskimennirnir fóru at tjena. Nú vil A. Samuelsen stilla teim nakað í útsikt, men hann átti heldur enn at gera nakað ið er so ósikkurt, haft roynt at fáa tær lógir, ið eru samtyktar, praktiseraðar í Føroyum sum har niðri. Um A. Samuelsen tá hevði skrivað til fiskimannafelagið og sagt teim frá tí fyrstu lógini, og hann hevði hjálpt fólki til at fáa stuðning eftir lógini um hjálp til dýrkað produktionstilfar, so hevði hann gjort, hvat hann átti. Nú eru vit komin í bakhond við hesum lógum, og hvat ið vit nú kunnu fáa, veit eg ikki.

A. Samuelsen: Tað Strøm sigir, eg skal hava sagt, um at vit skulu vera statsborgarar av 2. klassa, passar ikki; eg segði tvørturímóti, at vit vóru statsborgarar av fyrsta klassa A; eg veit ikki um Strøm nú hevir forstaðið meg. Eg vil eina ferð enn siga, at tað hevir ikki nakað sum helst at gera við okkara statsborgarrætt; at vit eru kommir av sama lið her, tað kann líka gott vera hr. Strøms skyld sum hvør annars. Táið vit hevdu hetta fyri ifjor, kravdi eg eitt útvalg niðursett, ið kraftiga kundi mæla at, at ministeriið hevir skuldað tann føroyska befólkning; tá stemmaðu hr. Strøm og hansara partí ikki fyri hesum, og teir hava tí fordað fyri, at nakað kraftigt kundi gerast fyri hesari sak. Strøm sigir, at eg kundi haft hjálpt Føroyingum til at fáa niðursett prísin á produktiónstilfari; eg havi hjálpt teimum til at søkja, sum hava biðið meg. Hvi skuldi eg skriva til fiskimannafelagið um hesa lóg? Tað var ein annar maður, ið var fólkatingsmaður tá, hann skuldaði sær ikki at skriva — nei, hann telegraferaði, at hetta hevði hann gjort. Eg havi altíð verið meira beskeðin. Eg kann gott forstanda, at man vil gera meg ansvarligan fyri, at lógin

ikki er komin til nyttu heruppi, men tað taki eg mær leist, eg veit, at eg eri utan skyld hari. Og eg veit eisini, hvør ið hevir skyldina, og eg skal altíð kunna leggja ansvarið har tað eigir at leggjast; tað er ikki hjá ríkisdegnum, og ikki hjá løgtinginum, men eg skal altíð vera til reiðar at vísa á hvør ið skyldina hevir.

M. Samuelsen: Alt tað sakliga í hesari sak er fyri so vítt útdebatterað, so eg vil ikki siga nógv, men bert anbefalla okkara uppskot. Lóguppskotið er gott í sínari heilheit, so tað vel kundi verið framsett av øllum rættheinkjandi menniskjum. Tað kunna vera vanskeligheitir við at gjøgnumføra lógina, men hitt partiið, haldi eg, hevir viljað framstilla vanskeligheitirnar nógv størri enn tær eru.

S. P. úr Konoy: Eg haldi tað vera nógv sagt av tingmanninum úr Halldórsvík, at allar rættheinkjandi menniskjur kundu haft framsett hetta lóguppskot, tí eg hevi ikki kunnað funnið, hvat princip liggur til grund fyri tí. Tað er ikki eftir princippum, sum tey eru í Danmørk, tí har kenni eg ikki til, at virkandi menniskjur kunnu fáa arbeiðisloysisstudning, utan tær eru í organisatión og gjalda kontingent. Her slær man inn uppá nakað heilt nýtt yvir fyri statskassanum. Um man heruppi vildi gingið soom leið sum í Danmørk og gjort arbeiðisloysiskassar, so vildi tað óivað verið ein betri vegur. Tingmaðurin úr Fuglafirði segði, at hann visti, hvar skyldin lá, og hann vildi siga tað á tí rætta plássi; tað er best, at hann sigir okkum tað beinleiðis. Tað vilja allir fiskimenn í Føroyum vera fegnir við at fáa at vita. Í 1917 varð tann táverandi amtmaður spurdur um hesa lóg; hann segði, at hann kundi eingi svara, tí tað vóru nøkur punktir, sum ministeriið fyrst skuldi útvtala seg um. Og nú liggur lotuta sak soleiðis fyri, at fiskimennirnir í Føroyum ikki njóta sama rætt sum fiskimennirnir i Danmørk.

A. Samuelsen: Eg havi fyrr sagt frá, at prinoippið í lóguppskotinum er tað sama sum í ti donsku lóg um studning til arbeiðsloysar fiskarar. Táið Konoy biður meg siga tað her, hvor ið hevir skyldina fyri at tann fyrsta lógin ikki kom til anvendilsi hor uppi, so eri eg altíð til reiðar til at siga tað, og eg kann gott siga tað her, tó at ein skuldi tráð tað var óneyðugt, skyldin liggur hjá amtinum, ið ikki hevir expederað sakirnar, tað vita allir, serliga hr. Strøm, ið er limur av útvalgtinum; hann hevir ferð eftir ferð sjálvur lisið bræv við frá amtmanninum, hvar hann sigir frá hesum. Táið so Konoy sigir, at tann fyrrverandi amtmaður ikki vildi geva upplýsingar í hesari sak, so minnist eg, at hann segði, at hann kundi eingi siga fyrr enn hann hevði fingið svar frá ministeriinum uppá nakrar spurningar. Hann má hava fingið svar, tí hann setti lýsing seinni í bløðini. Hatta var lógin um studning til arbeiðisloysar fiskarar. Hin lógin er ikki nógv anvend her uppi, tað eru kannar fáar ansøkningar, men tó nakrar, eg havi minst skrivað tvær, men teir hava enn eingi fingið.

S. P. úr Konoy: Hesar upplýsingar, tingmaðurin úr Fuglafirði gav, vóru ikki til serligt gagn, tí hatta vistu vit allir frammanundan; eg hugsi kortini, at hann sær væl so eisiðiga uppá tað, tí táið vit skriftliga spurdi hin fyrrverandi amtmann, hví lógin ikki var praktiserað í Føroyum, fingu vit tað svar frá honum, at hon kundi ikki praktiserast fyrr enn ministeriið hevði svarað uppá vissar tilsendar spurningar. Og tá hevði lógin longu verið nýtt í Danmørk.

A. Samuelsen: Tað er rætt nokk, at tann táverandi amtmaður úttalaði seg sum Konoy segði, men handa lóg hóskaði langt betur niðri í Danmark enn í Føroyum, hon var av fyrstan tíð bert gjørd fyri Danmark, men so undir behandlingini kom so ein paragraff inn, ið segði, at hon skuldi galda fyri Føroyar, utan at lógin sambíðis varð gjørd lagaligari fyri at anvendast í Føroyum. Eg skal ikki taka aftur fyri at hava fingið hatta sett inn í lógina frá Mortensen, hann var fólkatingsmaður tá, og tað varð sagt tá, at tað hann hevði gjort fyri sakina var alt, og tað eg hevði gjort, hevði eingi at týða. Tað framgekk jú tilstrekkiliga av valgagitatiónini ífjor, at eg hevði eingi gjort fyri at fáa lógina galdandi fyri Føroyar, í hvussu var eingi sum hevði nakað at týða. Tað hevði nú eisini verið natúrligt, um Edw. Mortensen hevði gjort meira um og; hann sat jú í fólkatinginum, í útvalginum. Tá Konoy sigur, at eg velti skyldina á tann núverandi amtmannin, so er tað jú ikki so; amtmaðurin hevur sjálvur sagt tað og begrundað tað. Nakað annað er, at eg ikki haldi, at hansara begrundilsir eru góð. Tað gerst ikki við, at hansara begrundilsi ikki passar mær og heldur ikki passar hr. Konoy — fyri tað standur tað fast, at táið Føroyingar ikki hava fingið hendu

stuðning enn, so er tað amtmaðurin sjálvur, sum hevur skyldina.

S. P. úr Konoy: Táið Andrass Sámalsson sá í landstinginum, at lógin var mangulfull, so átti hann at fingið hana broytta. Hann innrømmaði jú sjálvur, at hon hóskaði ikki so væl á hesum landi, sum vit stríðast um antin tað er Danmark ella ikki Danmark. Tað hevði aldeilis ikki verið út av vognum, um hann rættaði teir feilir, sum hann meinar Edward Mortensen hevði gjørt. Faktum er, at her var givið føroyskum fiskimonnum vónir um at fáa ein stuðning, sum teir ikki hava fingið. Tað fyrsta, eg fekk varhuga av at her ikki var alt sum tað skuldi vera, var á vártinginum ífjør, tá amtmann Rytter framførdi, at lógin ikki var fram pá grund av vissum fortolkningsspurmálum.

A. Samuelsen: Eg havi sagt, at lógin passaði betri fyri fiskarar niðri í Danmark enn fyri teir donsku statsborgararnar her í Føroyum, sum eru fiskarar. Tí eg havi aldri benoktað tað, at forholdini her og har eru forskellig. Tað eg gjørdi í landstinginum, var, at eg fekk nøkur úttalilsir frá ministaranum um, at lógin skuldi anvendast her uppi so lagaliga sum forholdini kravdu tað. At tað fór at ganga eitt sindur langsomt við at fáa hesar stuðningar útbetaltar til rætta tíð, var eg klárur yvir, men eg hevði ongatíð tríð, at lógin skuldi blíva stillað í bero. Tað er tað, sum gjørt er, og viss ikki nakað var blivið fyritikið heðani, so var neppa lív komið aftur í hana. Eg beklagi, at Føroyingar ikki hava fingið svar, antin eitt ella annað; tað hevði verið betri, um teir hevdu fingið nei við tí begrundilsi, at teir hevdu tjent fornógv ella líknandi, tí so kundi hr. Strøm og aðrir við honum ikki pástaðið við einum skini av rætti, men eisini bara við einum skini av rætti at vit eru annan klassas danskir borgarar Ansvarið fyri, at slíkt kann sigast og verða brúkt, hotta stóra ansvarið hevur administratiónin pádrigið sær í hesi sak.

S. P. úr Konoy: Hvat meinar tingmaðurin í Fuglafirði við orðtta tíð? Hví fingu Føroyingar ikki teirra stuðning fyri vetrarin 1917–18, tá danskir fiskimenn fingu teirra?

A. Samuelsen: Tann táverandi amtmaðurin meinti, at hann mátti hava klárheit yvir ymisk spurmál, áðrenn hann tók nakað avgerilsi. Hesi óklóru spursmálini sendi hann niður til erklering. Eg havi hoyrt mangt um amtmann Rytter, men at hann var langsamur í sínum expeditión, tað havi eg tó ikki hoyrt fyrr. Hann fekk eitt begrensað antal av skemaum. Frá fyrsta degi av at henda sakin fyrilá í Føroyum var tað nokk so, at føroyskir fiskimenn ikki vistu reiðuliga besked um lógina. Teir fingu altfyri eitt inatrykk av, at teir ikki her notu sama rætt sum teirra ríksfelagar niðri í Danmark.

Th. M. Strøm: Nú bekreftar hr. Samuelsen tað jú sjálvur, at lógin ikki er blivin anvend og ikki kundi anvendast pá sama máta her hjá okkum. Tað sama sogði amtmann Rytter, at lógin pá grund av fortolkningsspurmálum ikki strax kundi setast í kraft her. Teir bekrefta tað báðir, at vit eru annan klassas borgarar.

A. Samuelsen: Eg veit ikki, hvussu nógv skemair amtmann Rytter hevði av fyrstan tíð, men tað veit eg, at tá mau var komin so vítt, at fiskimonninir reiðiliga kundu gerast kunnugir við, hvussu teir skuldu søkja, tá var longu hópurin av teimum farin burt og kundi tí ikki imgeva andragandi. Nógvar konur hava henvent seg til mín og spurt um andragandini ikki kundi bíða til ífjør heyst, tí menninir vóru burtur. Konoy og hansara menn gjørdu ífjør nokkso nógv roks útav tí, at fiskimonninir vóru burtur frá valgimum, men teir vóru sanniliga eisini burtur frá at imgeva andragandir. Tað, at vit ikki kunnu gjøgnumføra eina lóg her pá sama máta sum hon er gjøgnumført niðri í Danmark bevísir ikki, at vit ikki eru borgarar av sama landi. Eg meini Strøm syngur tann sama melodiin enn og eg vil lata hann blíva við at syngja, men eg beklagi, at hann skal hava fingið nakað at syngja burtúr. Tí í virkuligheitini hevur hann óratt, men hann hevur her fingið eitt skin av rætti fyri sær.

S. P. úr Konoy: Hvussu tingmaðurin í Fuglafirði vendir og dreyar tað, so koma vit ikki burt frá tí, at her hevur verið ovseint atborið. Hví fingu Føroyingar ikki sínu skemair útleverað, táið Danskararnir fingu tey? Sjálvsagt, tá teir vóru burtfarnir var tað ovseint. Vit mugu taka bogynningin við. Hevði sakin verið farin útá livið her samtíðigt sum í Danmark, so hevdu føroyskir fiskimenn nú haft sín stuðning.

A. Samuelsen: Ja, hví sendi ministarin ikki skemair upp? Eg havi ikki rást honum fyri tað. Hann er ikki mín ministari, hann er ikki mítt partís ministari. Men hr. Konoy hevur takkað ministaranum, hví sendi hann ikki heldur tey boð niður til ministaran ífjør, at hann mátti skamma seg, tí hann ikki sendi skemaini í góðari tíð? Tað tordi hr. Konoy ikki, tað skal annað dirvi til at siga einum ministara sannheitina enn bara at takka honum. Um manu hevði fylt Konoy og gjøgnumført lógina av apríl, so hevdu nógvir fiskarar verið fráskornir at fingið undirstøttilsi, tí tá vóru nógvir burtur.

S. P. úr Konoy: A. Samuelsen kann ikki yvirbevísa meg. Hendan sak fekk eina óalmindiliga langsama gongd frá fyrstu stund, so tað sást, at hon ikki kundi gjøgnumførast. A. Samuelsen sigur, at tveir menn hava skyldina: hin núverandi ministarin og tingformaðurin. Tað er keðiligt, at teir hava horið seg soleiðis at. Eitt er vist. Vit hava ongar pengar fingið.

A. Samuelsen: Tá Konoy sigir, at eg havi lagt skyldina á ministaran og amtsmannin, so er nakar sannheit í hesum. Viðvíkjandi ministaranum, so hevur ministarin plikt at útføra lógina. Viðvíkjandi tí eg segði um amtmannin, so stemmar tað við tað, sum amtmaðurin hevur lagt framm her. Tá Konoy ikki vil trúgva tað, so má tað sigast, at hann er trúgvur móti sínum amtmanni. Tá amtmaðurin sjálvur sigur, at hann hevur skyld, so svarar Konoy: Eg fái meg ikki at trúgva tað. Slíkt má kallast at vera trúfastur.

S. P. úr Konoy: Eg havi ikki tað minsta at gera við; hvør sum er áhoyrdur til amtsmann her. So at eg havi ikki lut ella deil í Stahlschmidt.

A. Samuelsen: Eg talaði ikki um, at Konoy átti amtmannin. Men og sagði, at hann var trúfastur móti honum. — Annars vil og mæla til, at sakin fer til 3. viðgerð.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Lántoka.

2. viðgerð.

Orðføraren (*M. A. Winther*): Amtmaðurin hevur latið tingið vita, at tað ikki er nógv til av disponiblum miðlum í amtrepartitiónsfondini; so at tað er neyðugt at fáa passandi pening til at ráða yvir. Eg skal mæla til, at sakin fer til 3. viðgerð.

A. Samuelsen: Tað er rimiligt, at tað er neyðugt fyri tingið at upptaka lán, tí vit minnast, at tá vit fyri nøkrum dogum síðani fingu eina rokning, so vóru vit ikki mentir at betala. Her er ætlan, at vit skulu lána fra okkum sjálvum, lána 30,000 kr. frá fondinum til avloysing av jarðalvalinum. Hesin peningur stendur í sparikassanum og skal væl ikki brúkast í nærmastu tíð. Tað er eingi at siga til, at mann ger hetta. Uppskotið gongur út uppá, at vit skulu lána til 3½ pct. Í sparikassanum hava vit 4 pct. Mett tað má ikki vera meiningin, at hesin kassi skal missa pengar. Vit hava selt obligatiónir og latið tær í sparikassan til 4 pct. Tað er eitt annað bestemmilsi, sum geldur fyri sparikassan: At tá ein konto er yvir 10,000 kr., so geva teir 4 pct. Aleina kontoin fyri Miðvág má vera yvir 10,000 kr.; tí teir hava fingið so nógvar grindir har. Eg vóni vit skjótt kunnu fáa jarðalvalin til keyps frá Miðvingum. Hesir pengar standa altso til 4 pct. Og vit mugu ordna hetta, so at hendan fondin ikki missir nakrar rentu inntokur. Eg vil tí biðja orðforaran broyta uppskotið soleiðis, at tað verður sett 4 pct. staðinfyri 3½ pct. Tað vera bíligir pengar álíkavæl.

M. A. Winther: Hetta er naturligt. Men tað forútsoktust, at sparikassin gav 3½ pct. Naturligvís skal viðkomandi fond hava somu rentur frá tinginum sum frá sparikassanum.

O. Efferøe: Jeg er betænkelig ved det foreliggende Forslag, fordi jeg deri ser Begyndelsen til Enden paa Jordelvalsfondden. Naar vi trænger til Penge, saa laantor vi. Naar vi saa en anden Gang trænger til Penge, men det da bliver saa let at laane, og vil det da ikke gaa som med Kirkekasserne, der laanor fra hverandre. Man burde have fulgt det Forslag fra mig, at Tinget skulde laane et Beløb til Afløsning af Jordelvalen; saa vilde den Sag have været ude af Verden. Jeg lægger

megen Vægt paa dette Spørgsmaal om Jordehvalsrettens Aflosning, for at den Hval, som nu fraguar som Jordehval, kan lægges til Partahvalen.

M. A. Winther: So skuldi Effersoe hava stillað hetta uppskotið í ár. Men Effersoe hevur ikki vitað sær nakran máta at gera tað uppá. Vit hava stutt síðani lænt frá kirkjukassanum og lænt frá økonomisk fond. Hettar verður bíligt lán, tá vit sleppa við 4 pct. Mann lánar pengar her, sum mann lánar aðrastaðnis. Effersoes argumentir kunna ikki vera til hindurs her.

O. Effersoe: Jeg erkender, at vi har Brug for Pengene, men jeg er betænkelig for den Maade, hvorpaa vi vil skaffe Pengene. Min særlige Betænkelighed gælder, at tage Pengene fra denne Fond; jeg frygter for, at Aflosningen aldrig bliver til Virkelighed. Hr. Winther foreslog at optage et Laan til Aflosning af Jordehvalsrettighederne. Det skulde vi have gjort, da Status var bedre end nu, Renterne er ogsaa dyrere nu end før.

M. A. Winther: Ikki skuldi hr. Effersoe hava haft hatta á máli, at mann var ikki fastari bundin til hesar pengar, enn at mann kundi anvenda teir eisini til annað. Táið mann vil finna eitt ár tá Føroya økonomiski status var betur enn nú, má mann fara langt aftur í tíðina. Tann almindiligi status er í teim seinastu árum nógv framfarin; eg rokni ikki, um vit eitt árið eiga 10,000 í kassanum ella 20,000, sin slíkur kassabeholdningur hevir einki at týða í einari tíð sum nú. Tá mann bindur seg til at seta uppgávur í verk, má mann rokna við, at tær kosta pengar, og teir pengar má mann so útvega.

O. Effersoe: Jeg mindes ikke, at jeg skal have udtalt noget som det Hr. Winther fremførte. Hvad angaar Amtskommunens Status skal jeg ikke her komme ind paa det Spørgsmaal. Jeg skal kun nævne et Punkt: Aktietegningen til Skibet; det kan være, det gaar galt, men det kan ogsaa gaa ilde, og saa længe man ikke har mere Garanti for, at Amtskommunens Penge er sikre, er dens Status ikke god.

M. A. Winther: Ja, hatta var nakað, sum kann tosast um, men eg skal ikki koma inn uppá tað; hatta kann koma at betýða nógv fyri okkara økonomiska status, men eg havi eitt annað sýn uppá hesa sak enn hr. Effersøe.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Grundlógarbroyting.

2. viðgerð.

Orðføraríu (J. Patursson): Nevndin hevir býtt seg í meirluta og minniluta; og skal hon greiða frá meirlutans uppskoti. Vit hava framsett tvey, ikki heilt eins ljóðandi uppskot, við tað, at Mortensen hevir framsætt eitt, R. Rasmussen og eg eitt annað, men tey eru hvørt øðrum ógvuliga lík. Eg skal mæla tinganommunum til at geva meirlutans uppskoti atkvøðu, fyrst uppskotinum frá R. Rasmussen og mær, síðani, um tað ikki verður samtykt, Edw. Mortensens uppskoti. Eg skal loyva mær at lesa uppskotið upp:

A. Forslag fra Flertallet til Ændring i Danmarks Riges Grundlov af 5. Juni 1915.

I. Fra J. Patursson og R. Rasmussen:

Som særlig Paragraf indsættes:

»Færøernes forfatningsmæssige Stilling kan efter Lagtingets Indstilling ændres ved Love.

II. Fra Edw. Mortensen:

Til § 2, første Punktum, føjes:

. . . »og at Rigsdagens Myndighed, hvad særlige færøske Anliggender angaar, ved Lov skal kunne overdrages Færøernes Lagting«.

O. Effersoe: Der findes ikke i Udvalgsbetænkningen noget Punkt, som ikke har været fremme ved 1ste Behandling, og Mindretallets Standpunkt blev tydelig angivet ved den Behandling. Vi vil overhovedet ikke være med til at ændre Færøernes forfatningsmæssige Stilling i Riget; vi vil ikke have Færøerne ud paa nogen Glidebane. Vi ser i de Bestræbelser, som er fremme fra en vis Side, Bestræbelser for at ændre vor forfatningsmæssige Stilling, og vi er absolutte Modstandere deraf. Ét Punkt vil jeg omtale nærmere. Der er blevet agiteret stærkt med, hvad fremragende danske Mænd har huvdet om, hvilken Stilling Færøerne burde indtage i Riget. Derom staar der i det saakaldte Studenterbrev: »Da Spørgsmaalet var fremme om, hvorvidt Grundloven skulde gælde for Færøerne talte herimod blandt andre højtbegavede og fremragende Danske A. S. Ørsted, en af de største Jurister, du nordiske Lande har frembragt, Krigsministeren, den skarpsindige og vidtskuende A. F. Tscherning, N. F. S. Grundtvig, den store Skjald, fordi disse Mænd mødtes i Enighed om, at Færingar, som et særpræget Folk, med eget Sprog, egen Historie og egen-

artede Lovevilkaar, saa ulige de danskes, burde have en Undtagelsesstilling, naar Tale var om Rigsforbindelsens. Der sigtes altsaa her, at danske Mænd talte imod, at Grundloven skulde gøres gældende for Færøerne, og for saavidt man taler til danske Mænd, der ikke har den Betydning, som disse Mænd har haft det, har det sin Betydning i en saadan Sag at sige: Gak hen og gør ligesaa! Men hvad har da disse danske Mænd gjort? Inden man tog Stilling til Valgloven for Færøerne, mente de, at man burde spørge Færingerne selv. Jeg har ikke set, at betydelige danske Mænd har været imod, at Færinger kom ind under Grundloven, jeg har tværtimod set Udtalelser fra fremragende daværende Danske, der ligefrem ønskede at komme ind under Grundloven, f. Eks. Monrad udtalte sig saaledes, ligeledes Tscherning; her er aldeles ikke Spørgsmaal om nogen Modstand fra færøsk Side. Ogsaa den vedkommende Indenrigsminister udtalte sig i den Retning. Opfattelsen synes at have været den, at man burde have givet Færingerne Ret til at komme til Stede inden Valgloven blev vedtaget, og man kan vel give disse Mænd Ret deri. Men fordi det just ikke skete den Gang, saa er der ingen Grund til nu at hænge sig deri, fordi Færingerne senere gentagne Gange, sidst i 1915 har udtalt sig klart og bestemt om, at de ønsker at være under Grundloven. Jeg ser, at Hr. Edw. Mortensen indtager et Særstandpunkt; jeg forstaar ikke dette Standpunkt, der hævder, at Lovgivningsmyndigheden paa visse Omraader allerede er overdraget Lagtinget. Der staar saaledes: »Ganske naturligt har Rigsdagen i adskillige Tilfælde, hvor man i Danmark har ordnet Forholdene ved Lov, overladt til Regering og Lagtinget at træffe de nødvendige Bestemmelser for Færøerne.« Der nævnes saa nogle Eksempler. Jeg skal ikke komme ind paa det juridiske Forhold her, da det er et Spørgsmaal, der maa afgøres af betydeligere juridiske Autoriteter end Hr. Edw. Mortensen og mig. Men jeg maa sige, at de Eksempler, her fremdrages, Grindereglementet og en Del af Skolevæsenet, er ikke andet, end hvad der ofte er sket nede i Danmark. Der er vedtaget en Politivedtægt for København, et Forhold, der vedrører en stor Masse Mennesker, og det er alligevel overladt til Borgerrepræsentationen at fastsætte denne Vedtægt under Justitsministeriets Sanktion, men det fører dog ikke til, at man paastaar, at København indtager en Særstilling i Riget. Ligeledes hvad angaar Sundhedsvedtægter, har Rigsdagen der overdraget sin Myndighed til Kommunalbestyrelserne i Forening med Regeringen. — Jeg skal anbefale Mindretallets Forslag, der lyder saaledes:

1. Lagtinget afviser bestemt Forslaget om at indsætte en Bestemmelse i Grundloven, som gaar ud paa, at der ved almindelig Lov kan tillægges Lagtinget Lovgivningsmyndighed.

2. Tinget afviser ligeledes bestemt overhovedet enhver Ændring i Grundloven, som tager Sigte paa Udsondring af Færøerne.

3. Derimod imødeser Tinget med Glæde Gennemførelsen af de Ændringer i Grundloven, som vil være en Følge af vore sønderjyske Brødres Genforening med det danske Folk.

J. Patursson: Effersøe og Andr. Samuelsen skriva í tíðini, at tað ber ofteast afvísar Tanken om en Grundlovsændring, der gaar ud paa, at tillægge Lagtinget Lovgivningsmyndighed ved almindelig Love. Men hetta er heilt skeivt, tí vit fáa ikki lóggevandi myndighoit fyri lagtingið, um hetta verður upptikið í grundlógina, okkara stjórnarliga stoða verður ikki pottið broytt fyri tað. Her verður bara gjørt loddari fyri lagtingið at fáa tað broytt sum fólkið krevur. Tað skuldi tá sýnst at verið aldeilis merkverdugt, um Føroya lagtingsmenn verða ímóti, at vegurin verður opnari fyri Føroyingar til at fáa meira ræði á tingi, tá teir sjálvir yvirskja tað. Eitt mugu teir gera sær klárt, hesir menn, at tað hatar teimum einki í longdini at andova ímóti tí straymi, sum hetta uppskotið hevur borið fram, tí hann vindur meir og meira uppá seg úr tiðan ári.

Hesir menn bera okkara uppskot soleiðis fram sum tað kundi verið meint sum ein hóttan um atskiljan frá Danmark, nærmast sum eitt útslag av hati; vit vilja skilja okkum frá Danmark, tí vit kunnu ikki tola Danskararnar. Teir vildu ikki sagt tað same, um vit vóru í felag við Noregi ella Englandi, at vit vildu skiljast frá teimum, tí vit ikki kundu tola Nornenn ella Engilskmonn, nei, men Danskararnar toir vilja vit ikki hava nakað at gera við. Tað er á hesum grundarlagi, Effersøe hevur lygt sín samhaldspolitikk og loypt tað ómetaligu spillu í bæði niðri í Danmark og her í Føroyum. Okkara uppgáva er ikki at elva klandur við Danskarar, tað hava vit onga interessu av; vit vilja bara gera tað, sum kann vera til bata fyri okkara land og fólk. Var tað

Noreg alla Ísland ístaðinfyri Danmark, so hevði forholdið verið tað sama; vórn vit saman við Noregi og vit sóu at hin noraka grundlógin tálmaði okkara politiska framburði, so vildu vit eisini krevt av teimum, at teir góvu okkum fríar ræsur til sjálvmenning.

Tað sigist í álíti minnilutans at tað, hvorvitt Føroyingar í sinari tíð hava fingið tann innvirkan á ta fyrstu grundlógina, sum teir áttu, nú einki hevur at siga -- tað er bara søga. Tað sum hevur nakran týdning er, at føroyskir veljarar seinri hava samtykt grundlógina; tað sigast teir hava gjørt í 1915. Men tað hava teir ikki. Valgið stóð ikki uppá grundlógina, tað stóð uppá samband ella sjálvstýri, og í hvussu er hava føroyskir løgtingsveljarar ongatíð gingið til valg uppá grundlógina. Tann órættur, sum gjørdur var móti Føroyingum, tá grundlógin utan teirra vitan var gjørd galdandi her, er ongatíð afturbøttur. Hvat nyttaði Føroyingum hesir báðir menninir, teir kundu senda til ríksdagin? Tað var ikki tað, teir bóðu um og høvdu ynskt. Jeffersøe fer stórliga skeivur, tá hann sigur, at Føroyingar ongatíð hava mótmælt, at grundlógin varð galdandi her; tað gjørdu teir uppá sín vís. Teir vildu ikki hava nakran mann inn á stendarforsamlingina í 1846, teir sendu bonarbræv um at fáa aftur teirra gamla løgting -- tað varð teimum noktað. Seinri kom aftur boð til teirra um teir ikki vildu hava ein mann niður á ríksdagin, teir sogdu nei -- vit vilja hava løgting her í Føroyum. Tað kom tíverri ikki fyrrenn grundlógin var gjørd galdandi her. Hvat skuldu Føroyingar gera? Kann man forlanga, at Føroyingar úti um landið, summir burtur í torvi, sumir á fleyg, summir á útiróðri skuldu rópa vakt í govor, tá grundlógin varð upplisin í Havn? Tað var ikki minsta ódømi, at teir lótu grundlógina tinglesa, meðan Føroyingar enn lógu undir tí forferdiliga oki sum kongaligi monopolhandilin legði á teir. Órættvist var farið fram móti Føroyingum, eisini í samanburði við Íslendingar; meðan teir fingu tvørreisur ja uppí slag til teirra ynskir fingu Føroyingar nei. Jeffersøe meinar nú, at um valg kemur at standa uppá grundlógarspurningin, so vil hann og hansara partí bera sigurin heim. Tað er møguligt. Hann vann jú ein ómetaligan sigur í 1906, tá hann loypti út um Føroyaland tær raðuligu skrímsilsogur um sjálvstýrið, sum vildi skilja Føroyar frá Danmark, so vit komu at rekast úti á villum havi og endaðu við at verða ótnir av hemarum o. s. fr. Fólk var ótt í høvdinum, heila vilt av hesum geyli og í hesari nøðini lukkaðist tað Jeffersøe at skramla 1600 manns saman á valg. Hesi ferð fær hann neyvan so nógvar, men hann og hansara menn skulu nokk vita at bera tað fram, so at nú fara Føroyingar á grúgvu, tí sjálvstýrismenn hava ætið allar landsins pengar upp, og fáa vit sjálvstýri, so fer alt landið í stundini ít á sjógv. Men um teir eina ferð enn vinna uppá slíkt, so verður tað stokkbur varmi sum orðatakið sigur -- eg leggi ikki í at nevna, hvat tað sigur meir. Jeffersøe veit jú, hvussu tað so líðandi ár undan ári er gingið aftur á hondina við hansara veljaraflokki, síðan 1906; um tað einaferð enn skuldi eydnast honum at gjørt Føroyingar heilavillar, so kemur tó tann líðin, tá Føroyingar ikki lata seg ræða longur, og tá er úti við sambandspolitikkinum.

Minnitalið meinar ikki, at hetta uppskot okkara eigur at upptakast í grundlógini av principielle Grundea. Altso skal hesin rættur fyri Føroyingar stranda á princippunkt! Eg ivist ikki í tí at kundi hetta verið framlagt greitt og skiligt fyri mentaðum donskum monnum, utan nakran spillandi illgruna uppi í, so høvdu teir sagt: Verið so góðir! Tit eru eitt egið fólk í einum landi so heilt ólíkum okkara. Rokið tykkara sakir sjálvir sum tit halda tað hóskar tykkum best. Vit eru eitt frísinnað fólk, vit vilja einki band leggja á Føroyingar. Nú eru teir spiltir av ollum tí illgruna, sum í so mong ár er lisin og sungin í ovrum á teimum, men eg hopi tó kortini, at teir so við og við vilja siga so.

Fundurin varð útsettur til næsta dag kl. 1.

Fundur miðvikudag 17. september.

Grundlógarbroyting.

(Framh. av 2. viðgerð).

Edv. Mortensen: Tað hevur verið framfort í hesi sak og eisini í sakini viðvíkjandi setan av eini kommissión í løgtings- og skattalógini, at eg í 1915 havi stemmað fyri grundlógini, tó og hevri til sjálvstýrispartíið. Havav sæst, sigst tað, at grundlógin er galdandi fyri Føroyar og at vit hava verið tilfríðs við hana. Hertil er at siga, at tá grundlógin varð sett í 1849, var tað ivasamt, um Føroyar

hoyrdu inn undir hana. Og í 1851 framgongur tað av Ørsteds orðum, at hann er í iva um hon umfatar Føroyar. Hann sigir tá, at grundlógin er galdandi fyri Danmarkar ríki, og tað er givið, at Ísland ikki hoyrir til Danmark í tann forstand, og ikki Føroyar heldur. Um Føroyingar seinni høvdu staðið fastir uppá, at grundlógin ikki var og ikki skuldi verða galdandi fyri okkum, so høvdu vit verið leysir frá henni. Men tá so lógin um ríksdagsvalg kemur í 1850—1851, tá Føroyingar velja fólkatingsmann og landstingsmann, so verður grundlógin galdandi fyri okkum. Meðan tað soleiðis fyrst er ivi um grundlógin er galdandi fyri Føroyar, so er tað skiligt, at hon seinni kom at galda, og at hon geldur nú, um enn við serstøkum bestemmilsum fyri okkum. Tá eg tí í 1915 stemmaði fyri henni, so var tað tí eg viðgekk, at hon galt fyri okkum; men harvið havi eg hvørki forplikta meg ella sjálvstýrisflokkin til ikki í framtíðini at seta fram uppskot um grundlógarbroyting. Grundlógin í 1915 innihelt demokratiskar reglur, sum eg væl kundi steinma fyri. Men um okkara krøv ikki kunnu fremjast utan við grundlógarbroyting, ja, so krevja vit sjálvsagt grundlógarbroyting. Men eg haldi, at vit kundu koma nakað áleiðis utan grundlógarbroyting. Og hettar er frammsett í nevndarálitinum. Undir hesi sak er Føroya fíantsiella støða í Danmark umtalað. Eg kundi tess vegna vísa til tað eg á sinni skrivaði í Føroyatíðindi um hetta mál: Løgtingið átti at royna at skaffa sær so stórar inntøkur, at tað kom til 200,000 kr. árliga — ella 300,000 kr. í tann tíðum, tá nú eru. Eg haldi, at hesin peningur lættliga kundi skaffast við direkta skatt og eftir øðrum leiðum, sum tað offentliga plagar at nýta. Hendan vegin má okkara útviklingur koma at ganga, og vit mugu halda fast um tað prinsipp, sum er í okkara skattalógaruppskoti. Orðførarin fyri nevnitalinum fanst at, at eg í nevndarálitinum hevði skrivað at eg meinti, at ríksdagurin kundi yvirdraga til løgtingið ein part av síni myndugheit í lóggávusokum. Hetta er ikki nakað at óttast fyri. Vit hava jú longu sum er eitt sindur av serligum lóggávuvaldi. Tað er soleiðis vit og ikki ríksdagurin, sum hevur lóggávuvald viðvíkjandi grindaveiðu. Táið hann so segði um grindareglementið, at tað ikki er eitt dømi uppá, at løgtingið hevir fingið yvirdrigið eitt vist lóggávuvald, so má eg siga, at lógin av 1877 gevur nøktandi løgtinginum myndugleika til at fastseta reglur fyri ein part av okkara vinnulívi, og í grindareglementinum eru settar so inngripandi reglur um jarðahval og hvussu nógv sýslumenn skulu hava o. s. fr., at hetta á engan hátt kann sammetast við eina »politivedtægt«, tað er í virkuligheitini ein lóg, løgtingið har hevir givið. Reglur um skúlaviðurskifti framdrógu orðførarin, men kom ikki nærri inn uppá tær; har hava vit gjort so víttgangandi reglur, at tað ikki kann sammetast við danskar skúlaanordningar; tað har er fastsett við lóg, er her givið til løgting og ríkisstýri at skipa fyri. So er, sum eg havi framdrigið í nevndarálitinum, síðani 1872 ofta sett uppí eina lóg: »Denne Lov kan efter Lagtingets Betænkning ved kgl. Anordning sættes i Kraft paa Færøerne med de Lempelser, som ifølge Øernes særlige Forhold maatte findes hensigtsmæssige.« Hatta kann orðførarin ikki koma frá, har hevir ríkisdagurin delegerað sína makt til ríkisstýri og løgting í felag. Eg havi tí haft rætt til at siga, at ríkisdagurin í vissum tilfellum hevir yvirdrigið sína makt til løgtingið. Eg ivist ikki í, at um forholdið var gott, kundi ríkisdagurin í mongum viðurskiftum yvirdrigið til løgting og ríkisstýri at geva lógir fyri Føroyar. Hetta er ein interessant útvikling, her hevir funnið stað. Tað eru umráðandi viðurskifti, vit hava fingið broytt við kgl. anordning, vit hava otta heilt fingið umskapað tær donsku lógir og fingið heilt nýggjar reglur fyri okkum sjálvar. Fyrstu ferð, heilta kom fram, var við lógini um konkurs av 1872, tað kom uppí lógina við einum broytingaruppskoti í landstinginum. Tað er interessant at lesa, hvat justitsministarin sagði, táið sakin var til viðgerðar á landstingi: »Jeg opfatter Sagen saaledes, at, inedens Loven, som Lovforslaget oprindelig var affattet, ikke skulde være anvendelig paa Færøerne, er det nu ved det nævnte Forslag i Princippet udtalt, at den skal gøres anvendelig paa Færøerne, men ved Siden deraf er det udtalt, at der — hvad jo allerede klart er givet ved Sagen selv — paa forskellig Maade maa ske Lempelser ved dens Anvendeliggørelse paa Grund af de stedlige Forhold. Dersom Rigsdagen vedtager Forslaget, saaledes som det her er stillet af Udvalget, opfatter jeg derhos Sagen paa den Maade, at Følgen deraf vil være, at man indhenter Lagtingets Betænkning over de forskellige enkelte Punkter, hvori en Forandring maa ske, og at Spørgsmaalet saa kan afgøres ved kgl. Anordning uden at det paany behøver at forelægges for Rigsdagen. Dette er — tror jeg — Betydningen af Forslaget under Nr. 27, og der kan, naar Rigsdagen vil give

Regeringen en saadan Bemyndigelse, ikke være nogen Betænkelighed for Regeringen ved at modtage den.« Hetta vóru tey punktir, og gjarna vildi loyva mær at draga fram, og eg havi út frá mínari hugsan hildið, at tað uppskot, ið og havi sett fram til eina lyftisgrein er hóskandi við ta hugsan, ið liggur til grund fyri hesum áttalidsum.

R. Rasmussen: Tað var sagt nógv við fyrsta viðgerð av hesum núli, tað tykist eins og ikki minni skal verða sagt við 2. viðgerð. Tað mesta eg vil føra fram er komið av nøkrum, hr. Effersoe hevði frammi í gjár. Hr. Effersoe helt, at tað kundi vera mikið gott at vísa til, hvat týðandi menn hovdu sagt í tíðini ið farin er, tí tað kundi brúkast til at siga við minnitýðandi menn nú í tíðini: »Gak du hen og gør ligesaa.« Í hesum orðum lá ein brigdan móti sjálvstýrisflokkinum fyri at hava mishrúkt týðandi manna orð. So vildi hr. Effersoe taka til týðandi menn, hvat teir hovdu sagt, ið skuldi vísa nakað annað, og so kom hann niður á Monrad. Tað er kanska meira ein tilburður enn ein viljað ætlan, at tingmaðurin kom niður á Monrad. tí so mikið er víst, at táið talan er um at vinna rætt fyri ymiskar fólkaflókkar innanfyri ríkið, so eigur ein halst at lata Monrad vera í friði. Monrad var ein maður við stórum gávum, bæði sum prestur og menniskja, men hann hevir haft eina óheldiga hond, táið galt um at halda teir ymisku fólkaflokkarnar í ríkinum saman í góðum forstáilsi. Eg veit ikki, um nøkur eigur at nerta við ta ringu lagnu, Danmørk hevir haft av Monrads politikki, og haldi ikki, at stundin er til tess. At Monrad ikki vildi hava serstoðu fyri Føroyar, var sjálvsagt fyri hann. heilstatsmannin, — men hvat heilstaturin kom at kosta Danmørk, var nakað nógv meira, enn nakar hevði droymt um. Monrad týtti undir viðgerðini av valglógini orðið *skal*, Føroyingar skuldu vera undir grundlógini, segði hann; ein maður, ið stóð á okkara síðu, Tscherning, talaði hart at hesum *skal*, men hetta skal hevir verið til stóran skaða, ikki bert fyri Føroyar, men fyri fólkaflokkar yvirhovur. Monrad var ein maður, ið dugdi at síggja, hvussu galið hann hevði gjort, tað sæst av hansara praktikum og øðrum úttalilsum, men ein mann, ið hevir verið fyri so stórari ólagnu, tó at hann hevir haft góðan vilja, hann haldi eg, vit skuldu lata vera í friði. Hr. Effersoe sogði, at eingin ósemja hevði verið, um grundlógin skuldi galda fyri Føroyar ella ikki. Eg skal loyva mær at vísa á, at framrakandi danskir menn hava úttalað, at hon ikki átti at galda í Føroyum, so framrakandi, at Danmørk hevir ikki haft teir størri síðani. A. S. Ørsted hevir sagt tað fleiri ferðir, t. d. aftaná hann hevði talað um, hvussu valviðurskiftini áttu at ordnast í Føroyum. Hann segði: »Den eneste Betænkelighed, som derimod kunde haves, er, at det vil være en Afvigelse fra Grundloven. Men jeg kan ikke antage, at Grundloven ligefrem er anvendelig paa Færøerne, da disse ikke er nævnte i samme, og der intet Hensyn til Færøerne er taget under Forhandlingerne om Grundloven, ligesom det ogsaa er vist, at de i Lovsproget ikke indbefattes under Danmark.« Lísini Blechingberg segði táið vallógin var til 2. viðgerðar: »Med Hensyn til det Spørgsmaal, som her foreligger, maa jeg bemærke, at jeg ikke skønner rettere, end at Færøernes Stilling lige overfor Grundloven er den samme som Islands . . .« Um grundlógar gildi fyri Føroyingar sigur Ørsted: »Jeg har omtvivlet, at der burde gives nogen Valglov for Færøerne forinden Færingerne selv havde haft Lejlighed til at ytre sig angaaende det Forhold, hvori de ønske at staa til Grundloven . . . Jeg har antaget, at Færøerne ikke høre umiddelbart ind under Grundloven eller den indkomne Valglov, og dette har jeg begrundet ved, at Færøerne aldrig hidtil i Lovsproget er indbefattede under Danmark . . .« Aftur á síðu 39 -40 sigur hann: »Det forekommer mig ganske klart, at naar man kan udelukke Island fra Grundloven eller anse det for et aabent Spørgsmaal, om Island hører under Grundloven, og i hvilket Forhold det skal sættes dertil, saa maa det samme ogsaa kunne antages med Hensyn til Færøerne. Nú kann man siga mangt um Ørsted, at hann ikki kann takast leinan vegin til inntekt fyri eina ella aðra meining; at hann í síni politisku virksemi altíð avvegaði báðar síður av sini sak og tá hann tók ein beslutning gjørna vísti seg hvørur afturhaldsmann. Men *eitt* kann ikki sigast um Ørsted: at hann ikki var *lógkunnur* maður. Og júst tí fellur hansara orð við so tungari vekt sum frá nøkrum manni og tí at hann ikki var partigangari. Hjá honum er ikki ivi um, at Føroyingar í lógmálum hava serstaka stoðu, og at grundlógargildi fyri Føroyar hevur verið ivasamt frá fyrsta ferð av.

Tað endaði tó við at grundlógin varð ingilsin fyri Føroyar, uttan at Føroyingar vóru at spurdir, og at valglógin til ríkisdagin varð sett í gildi móti okkara vilja

á einum so ólagaligum tíðspunkti sum tað kundi vera, í eini tíð, tá Føroyingar vóru so aldeilis óbúnir til at taka við slíkum. Danir høvdu tá útbúgvið sig í o. u. 20 ár til at taka ímóti frium forfatningi, teir høvdu haft eina andliga veldingartíð langt frammanundan, og tó kundi tað vera ivi, um teir vóru búnir. Hvat tá Føroyingar, sum høvdu ligið so heilt avstongdir frá Europa og Danmark við tí ringu samferðslu, tá var! Føroyingar, sum enn tá lógu og knógvaðu undir kongliga handils okinum — tað sýnist sum mann nú á døgum hevur lyndi til at uppfata okkara landseinahandil á sama máta sum hin kongliga einahandilin, har landsins inntøkur fóru í lummarn á samvitskuleysum koncessiónshavarum og í kongsins kassa - - tað týðir ikki á góðan samfundshugsan at samanlikna henda handil við ein offentligan handil til gagn fyri landið. Men nettupp tað, at grundlóg og valglóg undir tílíkum viðurskiftum varð gjørd galdandi fyri okkum vísir best, hvussu skeivt her var farið at. Har vóru menn í ríksdeginum, sum peikaðr uppá tað; m. a. ein lógkønur maður, Jespersen, sum heldur seg til, hvat menn hava sagt honum, sum í langa tíð hava ferðast í Føroyum: at Føroyingar føla seg ótilfriðs, ikki tí teir ongan representant hava fingið á danska ríksdeginum - - tann tankin hevur slættis ikki verið frammi her, men tí at onnan har sat dem aldeles under Embedsvilkaarligheds Herredømme. Den Mand, som har været sendt dem som Amtmand, er i Virkeligheden Underkonge paa Færøerne. *Tað* eru Føroyingar ótilfriðs við. Teir vóru jú ókunnugir við, hvatið gekk fyri seg í Danmark, hví skuldu teir brellast eftir nøkrum, sum teir ikki vistu um! Teir elstu mintust enn hitt gamla løgtingið, tá eingin fremmandur undirkongur sat við ræðu, men fólksins valdi maður, løgmaðurin skipaði fyri tilgongdini. Hesin sami maður, Jespersen, áttalar eisini at eftir sínum kenskapi til hesi norðligu londini er hann ivaleysur í tí, at um Føroyingar fingu loyvi til at innvelja ein mann í ríksdagin og høvdu forstáilsi av, hvat teir gjørdu, so høvdu teir svara *nei* - - tí hvat kundi ein slíkur maður nytta toimum. Hann sigur: »Hvad Nytte skal den Mand gøre dem? Det ser jeg ikke, men jeg ser klart, hvilken *Skade* han vil gøre dem. Jeg tror, at naar her sidder en Mand fra Færøerne vil man sige: hvad klage I over, som er lige saa godt repræsenterede som alle øvrige danske, hvor kunne I nu forlange nogen større Raadighed over Eders egne Anliggender?« Hesin maður hevur sæð, hvat danska afturhalds valdið fór at siga við Føroyingar, tá teir kravdu meira ræði heima, hvussu teir fóru at brúka hina forovsku ríksdagsrepresentatiónina til skálkaskjól. Hvat gera tit nú vrevl um? Tit hava jú sama ræði sum allir aðrir Danskarar! Hotta hevur eisini verið brúkt gjøgnum tíðirnar til henda dag. Tit hava tað jú gott: heilar tveir mann á ríksdeginum! Men hesir menn eru okkum til onga verðsins nyttu — Jespersens orð eru sannað til fullnar. Hann ræður tí frá at gera nakað við valglógina: »Jeg tilraader derfor Tinget at forkaste denne Lov den Dag i Daga. Hin sami tiltiknd Tscherning úttalar seg um, hvørvitt tað hevur verið meiningin frá fyrstu hond at fáa oin representant fyri Føroyar; tað hevur als ikki verið meiningin, sigur hann: »Havde man antaget, at det var en nødvendig Betingelse for Danmarks Rige, at der skulde være en Repræsentant for Færøerne, saa havde vi ikke skrevet en Valglov, hvori vi havde ladet det staa som et Forbehold om denne Repræsentation skal komme eller ikke. Der staar i Valgloven ikke et Ord om, at der *skal* komme en Repræsentant for Færøerne . . .« Hann sigur síðani hvussu tað vil ganga, um vit fáa ein slíkan representant, og her er tað áhugavert at siggja, at júst soleiðis hevur tað gingið: »Er en Repræsentant her fra Færøerne og han er Regeringen imod, saa er Amtmanden og Provsten de sande Repræsentanter«. Hvussu ofta hevur hetta ikki verið so; hetta eru júst teir menninir, regeringin vendir sær til. Í tí tilfelli, at regeringin er við honum verður hann bráktur sum skermbrotti fyri regeringsins meining um lógmál í Føroyum, sum hin sakkoni maðurin móti himum. Og sigur Tscherning: »Dersom vi paalage os at udgive den Art Love, som her vil blive Spørgsmaalet over for Færøerne, saa begive vi os ind paa et fremmed Gebet, hvor vi lige for vore Øjne, uden Sagkundskab og med Frygt maa se Sagen uddebatteret mellem Regeringen og en enkelt Mand, eller afgjort bag denne Mands popitlære Skærmbrædt . . .« Hann hevur eitt ringt orðalag og fleiri við honum til Føroyingarna representatión niðri á ríksdegi, og tíverri er tað blivið samað gjøgnum tíðirnar. Viðvíkjandi tí, at vit við hesa representatión skuldu verða knýttir nærri at Danmark, sigur Tscherning: »Færøerne er ikke i mindste Maade ved denne Valglov bragt i nogen Samklang med Danmark. Færøerne er ikke kaldede frem til at blive en individualitet, som vi ønske, at de maa blive, og uden

hvílkon de aldrig ville gøre syndarlige Fremskridte. Hetta er tað sama, sum so ofta er sagt av okkum: Hvat nyttar tað Føroyingum, um teir nógso mikið taka deil í donskum politikki, tí vit ikki herheimi hava okkara serstaka politiska lív, sum kann vekja og menna okkum! Annans gera hesir menn á ríksdegi hert ógagn: Tað, sum ger Føroyingar verdífullar fyri ríkinum, tað er nu vit kunnu blíva ein »individualitet«, ein nation. Tí mega vit ikki framvegis blíva við at koma undir grundlógina við okkara serligu lógnálum.

Móti Jespersens ávísan av hvat skaða tað fór at gera, um Føroyingar komu undir grundlógina, var framhildið av innanríkisministaranum og Monrad, at tað gjordi eingki; Føroyingar kundu ordna teirra kommunalu innrættingar aftaná. Men vit vóru blottaðir fyri ollum miðlum sum fólk hevur til at ytra seg yvirfyri offentligheitini. Teir meintu, at hetta kundi vit ordna aftaná. Jespersen sigir, at tað er ikki so, tí hevur mann fyrst fingið eina skipan hvar fólk er óbúgvið, so vil hon gera tað, at hetta fólkið aldrinn verður búgvið. Jespersen sigir, at vilja tit ikki geva Føroyingum eitt ting, sum er teirra, so lati teir behalda hitt kongaliga einavaldið heldur enn at geva teimum eitt surrogat til at ugga seg við. Hesin sami maðurin líknar eisini saman, hvussu Íslendingar og Føroyingar stóðu í hesum syfti. Hann meinar, at Føroyingar sum Íslendingar kundu fingið loyvi at úttala seg, og hann heldur, at høvdu Føroyingar onga representatión, so áttu teir at fáa eina representatión. Hann sigir: »Det vækker nogen Forundring, at Islænderne lod sig forstaa med at Island ikke bryder sig om at have nogen Medlemmer paa Rigsdagen. Men Island indsaa, at fik de Medlemmer der, saa var deres Selvstændighed tilintetgjort. De fem Medlemmer, som den Gang sad i denne Sal, sad for at vogte paa, at Valgloven ikke blev udvidet til Island, saa at Islands Selvstændighed ikke blev beskaaret.« Og Jesperson meinti, at Føroyingar vildu gjort líka so um teir sóttu saman við Íslendingum. Tað ivist eg heldur ikki í. Og tá hevði stillingurin verið ein annar enn hann er nú. Tað vóru menn á ríksdeginum, sum viðgingu, at Føroyingar vóru ein serlig nation, sum hevði krov og rættindir. Tað var tá sum nú drigið samanlíkning millum Bornholm og Føroyar, og ein av teimum donsku ríksdagsmonnunum úttalar í hesum viðfangi: »Bornholm er kun geografisk skilt fra os, men historisk og nationalt er det med os. Dette er ikke Tilfældet med Færøerne, som har en Nationalitet, som er meget forskellig fra vore. Tá vit lingu tað ólagaligu stoðu í Danmark, tá skyldast tað ikki tí, at tað ikki vóru tilstrekkiligar røddir á lofti, sum bóru tað motsetta fram. Nej, tað er gjort við fullum vitandi móti grundgóðari mótstoðu, sum framford var av Danmarkar bestu monnum. Vit fingu hetfar oman yvir okkum, tá vit vóru politisk óbúnir. Vit hildu, at vit hevdu fingið fólkafrælsi, meðan tað tó afdeilis ikki var so. Tað politiska gjøgnumbrotið hjá Føroyingum kom ikki fyrr enn í 1906. Síðani eru einans liðin 12 ár, og tað er ein stutt tíð til at menna eitt fólk. Føroyingar eru nú politiskt staðið á sama stoðu sum Danir vóru í 1848, og Føroyingar krevja nú akkurat tað sama sum teir. Men vit standa enn í klovningi og einans helmingurin av Føroyingum er vaknaður. Av hesum sum eg her havi sagt vil tað sigast, hvussu forsvarligt tað er, sum vit her seta fram í hesi sak.

O. Effersøe: Jeg vil værge mig imod, at jeg skal have til Hensigt at svare paa alt, som nu er fremkommet under denne Sag, og at det skal udledes af min Tale, at jeg erkender det, som jeg ikke svarer paa. Tiden er saa fremskreden, at man bør begrænse sig. Jeg vil hovedsagelig tale om et bestemt Hovedpunkt, som har været dragot frem i Diskussionen. I Gaar fremholdt jeg, at gode danske Mænd var blevne misbrugte i denne Forhandling. Og jeg vil nu understrege det, A. S. Ørsted skal have udtalt sig imod, at Grundloven skulde gøres gældende for Færøerne. Det er ikke rigtigt. Og der er ikke noget, der har afkræftet denne min Paastand. Jeg har ogsaa nævnt Monrad. Men man siger, at jeg bør ikke tale om Monrad, selv om han har taget fejl, som en skarpsindig Mand kan gøre. Men jeg henviste ikke blot til Monrad, jeg henviste til Udtalelser, fremførte af forskellige Mænd, da Valgloven og Grundloven var til Behandling. Det, som man den Gang fremdrog, var dette: Ørsted siger, at det fremgaar ikke af Grundloven, at den er gældende for Færøerne. Dette er vel rigtigt. Jeg tænker, at man, da man gav Grundloven, ikke har fundet Anledning til særlig at omtale Færøerne. Men med Hensyn til dette Spørgsmaal maa jeg sige, at det kun har historisk Interesse, idet Grundloven som den nu er, er bleven bekræftet af de færøske Vælgere. Naar hegge de færøske Partier og deres Folketingsvælgere har sluttet sig til Sagen, saa kan man i Virkeligheden sige, at de færøske

Vælgere har sluttet sig til den, om ikke alle Lagtingsvælgerne har sluttet sig til den. Intet tyder paa, at disse Vælgere skulde have en anden Mening. Lagtingsvalgene har faaet tilsvarende Udfald som Folketingsvalgene. Man har talt om, at Færøerne ikke efter Grundlovens Indhold eller Ordlyd var indbefattet under den. Dette Spørgsmaal er dog ligegyldigt. Endvidere har man sagt, at vi ingen kommunal Repræsentation havde, som kunde repræsentere os paa det nationale Omraade. Vi har faaet vor kommunale Repræsentation. Vi har vort Byraad, Forstanderskaber og vort Lagting, der har Selvstyre, saa vidt Grundloven tillader og bestemmer. Det havde man ikke den Gang. Det næste Spørgsmaal, som blev fremholdt, var, at det var urigtigt, at man vilde gøre Valgloven og Grundloven gældende paa Færøerne uden at Færinger var hørte. Man fremhævede, at den Mand, som havde repræsenteret Færøerne paa den grundlovgivende Rigsdag, ikke var valgt af Folket, men var den daværende Amtmand. Jeg synes ogsaa, at der den Gang er begaaet en Fejl, men man begik den vel af praktiske Grunde, men den var til Stede. Jeg synes dog ikke, at det er nødvendigt nu at opholde sig derved, det har kun historisk Interesse; Færingerne har senere Gang paa Gang bekræftet Grundloven. Jeg vil igen fremhæve, at Benyttelsen af det historiske i dette Spørgsmaal er urigtigt anvendt, hvad enten man anvender det grove Skyts, Ørsted eller Tscherning f. Eks., eller det lettere, Jespersen, som R. Rasmussen har talt saa meget om, jeg kan ikke forstaa, at der skal være saa megen Tale om Jespersen, naar jeg ikke maa faa Lov til at nævne en saa fremragende Mand som Monrad. Jeg skal, da det er blevet fremført, at Ørsted var en Modstander af, at Færinger kom ind under Grundloven, nævne følgende, som Ørsted har fremført; han er utilfreds med Fremgangsmaaden, at Færingerne ikke er spurgt. Han siger: »Medundertegnede Ørsted holder for, at denne Sag er ikke moden til Afgørelse, førend der er givet Færøernes Indvaanere Lejlighed til at ytre deres Tanker om dette for deres fremtidige retslige Stilling og for deres Velfærd saa vigtige Anliggende.« Senere siger han: »Men dette vil, saavidt jeg skjønner, gøre det nødvendigt, at enhver saadan Sag først underkastes en lokal Overvejelse paa Færøerne, hvorefter den, da det maa anses afgjort, at den endelige Beslutning ikke bliver hos Regeringen, maa behandles i Rigsdagen, hvorved de ogsaa Færøerne maa være repræsenterede«. Han ønsker altsaa en lokal Overvejelse paa Færøerne — det er, hvad vi har nu — men siger derefter udtrykkelig, at den endelige Beslutning bør være i Rigsdagen, dette er den Mand ganske klar over. Han siger kort efter: »saaledes forekommer det mig nødvendigt, at Beboernes Stemme først haves angaaende Maaden, hvorpaa Færøerne der skulle være repræsenterede«. Det er Maaden, han ønsker at faa slaaet fast, hvorledes de ønsker sig repræsenteret, ikke andet. Endvidere siger Ørsted: »Naar det nu menes, at den behørige Omsorg for Færøernes Ejendommelighed kan træffes, naar vi have færøske Repræsentanter her i Forsamlingen, saa er det vel meget godt, men dog kun under den Forudsætning, at disse Repræsentanter er valgte paa en saadan Maade, som svarer til Færingernes Tarv og Ønske«. Dette skal altsaa bestemmes efter Færingernes Ønske og ikke som det behager Rigsdagen at ved tage det paa den Tid, og det er dette, Ørsted fremhæver Gang paa Gang, at der bør gives Færingerne Lejlighed til at gøre deres Mening gældende ved Afgørelsen af denne Sag.- Grundtvig taler ogsaa om, at han mener, der skal være en Indstilling enten fra et Lagting eller en anden folkevalgt Forsamling inden Rigsdagen tager Beslutning, saaledes som det er gengivet i Paturssons Bog Pag. 64. Senere Pag. 65 staar en Udtalelse af Tscherning, som jeg gengav i Gaar, men som jeg her vil læse igen: »Her er altsaa ikke Spørgsmaal om nogen Modstand fra Færøernes Side, og altsaa ikke noget Spørgsmaal om noget »skal«. Saaledes siger Tscherning; jeg nævner det kun, fordi d'Hrr. har draget ham saa meget frem for at forsvare deres Standpunkt. Det har ingensinde været disse Herrers Mening, at Færingerne ikke skulde komme ind under Grundloven, og det er et aldeles uforsvarligt Misbrug af deres Udtalelser, at give det Udseende deraf. Hr. Edw. Mortensen sagde, at han havde gerne vist bekræftet Grundloven i 1915, men det forhindrede ikke, at man senere kan komme frem med Forslag om Ændringer. Men jeg synes, det er underligt, at man Grundloven bliver ændret, og der saa i Folketinget sidder en Mand, valgt hovedsagelig med Stemmer fra det Parti, der ønsker vor Stilling i Riget ændret, at han saa ikke fremdrager denne Forfatningsændring under Behandlingen. Naturligvis, Hr. Mortensen har gjort et lille Knips i Jammen, der betod, at han forbeholdt sig alt muligt, men jeg tror ikke, at Rigsdagsmændene af hans Tale har haft denne Opfattelse. Hr.

Edw. Mortensen fremholdt, at der ved de Udgifter, der kræves af Lagtinget, kræves et Budget paa 300,000 Kr. Jeg ved ikke, om det just skulde være nødvendigt. Det kommer an paa, hvor meget man vil lægge over paa Lagtinget og hvor meget paa Kommunerne. Det fremstilles altid af d'Hrr., som om det er Lagtinget, der skal paatage sig at sætte næsten ethvert Foretagende heroppe i Værk. Men det bør man ikke sige. Byrderne maa fordeles mellem Rigsdag, Lagting og Kommunerne. Hvad angaar Spørgsmaalet om, at Rigsdagen i visse Tilfælde skal have overdraget sin Myndighed til Lagtinget, skal jeg ikke komme ind derpaa, det er underligt, om der skulde være en betydelig, virkelig fremragende juridisk Autoritet, der vil forsvare det Standpunkt, at man saa ikke har draget ham from. Hr. Paturssøn fremholdt, at Selvstyrepartiet har været i Fremgang lige siden 1906 til nu. Det kan ikke nægtes, at sidste Folketingsvalg gav et forholdsvis større Stemmetal paa Selvstyrepartiets Kandidat end i 1906, det varede jo en rum Tid inden man overhovedet spurgte nogen nævneværdig Tilslutning til Selvstyrepartiet, og det store Stemmetal ved de sidste Valg beroede jo dels paa Overrumpling, dels paa at Kandidaten opstilledes udenfor Partierne. Det, der har den største Livskraft, vil leve længst, vi kan ikke slutte fra, hvad der er sket i 12 Aar, til hvad der vil vedblive at ske; den, der lever længst, vil faa at se. Jeg tror, at vort Standpunkt er mest livskraftigt; man behøver blot at spørge: hvorledes vil Selvstyrepartiet klare alle Udgifter ved et gennemført Selvstyre? Jeg har i min Virksomhed været overmaade forsigtig, saa det ikke skal kunne siges, at jeg har udtalt andet om mine Modstandere, end hvad jeg kan staa ved. Jeg skal dernæst ikke sige, at der indenfor Modpartiet ikke endnu findes Personer, som ikke deler Hr. Paturssons Opfattelse. Han vil gerne give det Udseende af, at Vælgerne i 1906 var paavirkede af Raadsel. Ja, naar *han* har Brug for Vælgerne, saa er de dejlige nok, men ved andre Lejligheder taksurer han dem ikke saa meget. Hvis Paavirkningen den Gang skyldtes Raadsel, saa var den i hvert Fald ikke skabt paa den Maade, som i 1918, da man Dagen før Valget serverede Historien om Værnepligt for Færinger, udstyret med allehaande Skrammelbilleder efter de bedste Monstre. Hvis der i 1906 var skabt en vis Raadsel blandt de færøske Vælgere, saa var det ud fra noget, der havde været fremlagt aabent for Befolkningen i et længere Tidsrum, saa enhver Vælger kunde tage sin Stilling dertil. Den Gang havde Vælgerne virkelig noget at være bange for, og Befolkningens sunde Sans reagerede derimod. Det samme vil være Tilfældet nu, hvis dette samme Spørgsmaal holdes frem isoleret, klart og uden Omsvøb for Befolkningen.

R. Rasmussen: Effersøe roynir at lasthalda tað, at grundlógin er galdandi fyri Føroyar, tí føroyskir veljarar hava innrømma tað. Men her á løgtingi hevur hon ongatíð ligið, og Føroya veljarar hava ongatíð havt leyligheit til at úttala seg um okkara forhold til grundlógina við nakað løgtingsvalg. Hvat týðning, eg tilleggi okkara representantum á ríksdegi, tað havi eg sagt, og eg tilleggi teirra góðkenslu av grundlógini sama týðning. Í 1915 høvdu sjálvstýrismenn ongan anleidning til at fáa grundlógarbroyting, tí tá ráddi sambandið á løgtingi. Maðurin, ið sendur var niður til fólkatingið, stóð tá utanfyri partíini og sjálvstýrismenn vóru tí sjálvsagt ikki bundnir av, hvussu hann stillaði seg til grundlógarspurningin.

Tað grovara skjútsi kallar Effersøe Grundtvig og Tscherning . . . ja, nú rópar Samuelsen ølítli hundure — hatta orðið hevur serliga vekt fyri hann; hann leitar altíð gullkornini upp . . . Effersøe meinar, at man við meira rætt átti at tosa um, hvat Monrad helt. Ja, tað er óivað, at tann politikkur, Monrad førdi, hevur haft alvorligar fylgir fyri Danmark, men eg veit ikki, um Effersøe heldur, at tær hava verið Danmark til hata; eg hugsi helst man skal lata verða at tosa ovnóg um tær.

J. Paturssøn: Eg var fegin við eitt, sum Effersøe segði: At tað var óbeint gjørt nóti Føroyingum, at valglógin til ríksdagin varð sett í gildi uttan at Føroyingar vóru atspurdir. Tað eri eg glaður við at luyra. Men tað er ikki beint av Effersøe at siga, at alt, sum er talað harniðri á stendarforsamlingini og á tí grundlóggevandi ríksdeginum bara hevur soguliga interesse. O nei, tað eru tey somu mistøk, har vóru gjørd, sum vit líva uppá enn. Var hesin stóri feilurin, sum Effersøe nevndi, ikki gjørdur tá, so hovdu vit ikki nú á døgum haft hetta tjakið. Tað stóra mistakið í 1856 var tað, at grundlógin ikki varð fyrilagd løgtinginum áðrenn hon var tinglisin her, og tað hevur hon ikki verið síðani, fyrrenn nú spurningurin liggur fyri her á tingi. Og nú stendur løgtingið sum tað gev, so fleirtalið av tingmonnum er samsint um at krevja grundlógarbroyting. Her er For-

oya fólks rætta representatión og ikki hjá tí manni, sum fólkið á annan háft valur til ríksdagin. Nú vil Effersøe ganga við, at har var órættur gjørdur móti Føroyingum í 1850, men hvussu bar hann okkum, sum hava hildið tað fram, út fyri Danskarum, tá hann í 1906 kom niður á ríkisdagin? Hann byrjaði sína ríksdagsvirkan við at eyknevna okkum separatistara og tálið hann soleiðis var begyntur, so vísti mun, hvussu vítt hann vildi driva tað. Men vit skoyta ikke um at man fyrst floygir við ótíðligheitum og síðani roynir at kína aturumaftur. Tað var ein skamplettur Effersøe setti á Føroyingar, tá hann kom niður, tað er ein skamplettur fyri okkum at hava haft ein slíkan mann sum okkara útsonding niðri í Danmark.

O. Effersøe: Der kan ingen Tvivl være om, at alle Selvstyrepartiets Vælgere stemte for Hr. Edward Mortensen som deres Repræsentant. — Nej, Hr. Patursson tager fejl, naar han mener, at vi fremdeles lever paa de Fejl, der blev begaaet i 1850; de færøske Vælgere har senere tilfulde godkendt den Ordning, som dan Gang blev truffen. At det nu skulde være godtgjort, at Færinger ønsker at tage Stilling i modsat Retning kan jeg aldeles ikke erkende. D'Hrr. husker nok ikke, at de kun repræsenterede et Mindretal af de Vælgere, som ved det sidste Valg afgav deres Stemmer. Det nytter dem ikke noget at køre op med det. — Hvorvidt min Virksomhed har været til Skade eller Gavn, til Skam eller til Ære for Færøerne er Hr. Patursson ikke Mand for at bedømme. En saadan almindelig Dom fra ham kan jeg aldeles ikke anerkende. Jeg kunde fremlægge mange gode Mænds Vidnesbyrd om min Virksomhed, der sigor noget helt andet end Hr. Paturssons, og jeg er ikke angstelig for Eftertidens Dom. — Jeg har ikke brugt Øgenavne om d'Hrr., som Hr. Patursson siger; Udtrykket »Separatistere var fuldt berettiget. Dengang havde Partiet jo ikke officielt antaget Navn af »Selvstyreparti« — ikke saa vidt mig bekendt i hvert Fald. Men naar d'Hrr. nu er saa rasende over, at jeg har brugt Betegnelsen »Separatistere, saa undrer det mig højlig, thi efter den Stilling, d'Hrr. nu indtager, maa de selv kunne indse, at Navnet er fuldt ud berettiget. Deres Politik er jo decideret Separatisme og intet andet. Hvad skal saa de Narrestreger til!

R. Rasmussen: Tingmaðurin á Tvøroyri framhelt íáðni, at Ørsted ikki hevði framsett nakað ynski um eina aðra skipan fyri Føroyingar. Nei, soleiðis var Ørsted ikki. Tað er vanskiligt at finna hansara ynskir í forhold til tær sakir, ið fyri lógu, tá hann var politikkari. Maðurin var eisini konservativur. Men tað er ikki tað, vit leggja vekt uppá, vit vísa á hvat hin lógkonni Ørsted úttalaði um Føroya statsrættsliga stilling *sum sína vitan*, og tað hevur vekt. Og hinir vóru við honum til reiðar at fylgja tí stillingi, Føroyingar ynsktu, antin teir vildu frá ella til. Men tá vóru Danskarar ikki undirvístir í tí áskoðan, sum Effersøe hevur givið teimum seinni, og sum eg vil kalla grundfalska.

Hr. Effersøe vil taka Grundtvig til inntekt fyri sambandið, har hann tosar um, at tað er ein lukka fyri Danmark, at teir hava behildið Føroyar og Ísland. Grundtvig úttalar seg her serliga um teir andligu verdírnar, sum funnust í Íslandi og í Føroyum, og sigur, at økonomisk hevur Danmark ikki stóran fordeil av hesum londum, men tess meira aeu og andligan vinning av at hava tey aftrat Danmark, men, sigur Grundtvig tun Føroyingar, »fordi vi til en vis Grad have paatvungut dem dansk Tale og danske Love, fordi vi have ophøvet og ikke, saaledes som paa Island senere stræbt at oprette deres gamle Ting, derfor mener jeg, at vi kan hverken være paa mindste Maade mere berettigede eller tilsyneladende til at fortsætte den Uretfærdighed og den Ubilligbed mod Færingerne, som vilde gaa ud over os selv, der som sagt ikke have anden Gavn af dem end den, vi skulle have med deres gode Vilje og igennem deres Tilbøjelighede. Grundtvig sigir, at Danir longu hava nógv at bota fyri tað, sum teir hava gjørt ímóti okkum.

O. Effersøe: Nu kommer R. Rasmussen frem med, at Ørsted er en Mand, som overhovedet ikke har haft noget Ønske. Han reducerer ham til en solle Person. Det gør jeg ikke. I Studenterbrevet er fremført, at Ørsted har sagt, at Spørgsmaalet om Grundloven skulde gøres gældende for Færøerne, maa besvares derhen, at den ikke skulde gøres gældende. Hvorfor har d'Hrr. fremført dette. Det er hverken fornuftigt eller rigtigt, men jeg forstaar nok, hvorfor det er gjort. R. Rasmussen taler om Grundtvig og fremhævede hans Krav om Færøernes Særstilling. Der var dem, der var uenig med Grundtvig. Vi mener, at Kravene om Særstilling er skat Fyldest gennem Lagtingsloven og den politiske Udvikling. Med Hensyn til Aaret 1906

skal det ikke lykkes R. Rasmussen at fremhæve noget fra min Side, som ikke kan forsvares. R. Rasmussen førte Sigtelser imod mig uden at han var i Stand til at begrunde dem.

R. Rasmussen: Eg skilji ikki, at ein maður við fornuft kann bruka orðið ssedo um Ørsted. (Ein rødd: solle). Nú, - - tað var orðið sællos, sum Effersøe brúkti. Um Effersøe hevur brúkt orðið sællee um Ørsted, so er tað nærmast forferdiligt. Ørsted viðgongur ífylgi sín juridiska vitan, at viðvíkjandi lóggávuvaldi, so átti Føroyar eina aðra støðu enn Danmark. Hann úttalaði sog týðiliga ímóti, at grundlógin skuldi gerast galdandi fyri Føroyar, tí at Føroyar altíð hevdu eina serstøðu. Um Føroyingar í hesum viðurskifti hevdu kravt nakað, so hevði Ørsted verið tilreiðar, at lata teir fáa tað.

O. Effersøe: Jeg forstaar, at R. Rasmussens Høresans ikke er god. Han troede, at jeg sagde ssode. Jeg brugte Ordet sællee. Men jeg sagde, at Ørsted var en sølle Person efter d'Herrers Fremstilling.

R. Rasmussen: Eg kann forstanda, at Effersøe gongur frá, at hann hevur kallað Ørsted ein sølle Persone.

O. Effersøe: Det er fuldstændig Usandhed, en fuldstændig Forvrængelse. Men denne Gang skal det ikke lykkes at forvrange mine Ord. Jeg brugte Ordet ironisk. Og lad os saa blive fri for saadanne Forvrængninger, det er altfor komisk.

R. Rasmussen: Eg veit, at Effersøe plagar at royna at vera ironiskur. Nú heldur hann, at eg vil vera komiskur.

O. Effersøe: Jeg er aldrig komisk. Det er R. Rasmussen derimod. Min Udtalelse var positiv.

R. Rasmussen: Nú eru vit í grovum skjúfsi. Sakin er tann, at tað forholdur seg, sum eg sigi.

O. Effersøe: Det er altfor galt at diskutere paa den Maade. Hvorfor kan det falde nogen ind, at jeg sagde dette om A. S. Ørsted.

R. Rasmussen: Men hví segði Effersøe tað?

A. Samuelsen: R. Rasmussen er tann síðsti, sum kann siga, hvat Effersøe sagði, tí hann lagði týðiliga fyri dagin, at hann vist-i tað ikki. Hann royndi at kanna eftir, hvat aðrir sogdu, at Effersøe hevði sagt. - - Eg kann í allum slutta mog til, hvat orðforarin fyri minnitalinum hevur flutt framm. Ein stórur partur av tí diskussión, sum ford er í dag, kundi verið spard. Tað er nær líkagyldugt, hvat hesir menn, sum talan er um idag, hava sagt fyri mansaldrum síðani. Her skuhu føroyskir veljarar hava tað avgerandi orðið. Um vit her á tingi viðtaka at vilja broyta grundlógina, so má næsta skritt vera at upploysa tingið og vita, hvat føroyskir veljarar vilja. Teir forátsetningar, sum vóru í Ørsteds, Grundtvigs og Tschernings tíð, eru ikki tilstaðar nú. Um hesir menn hevdu livað nú, vildu teir slett ikki sagt tað sama sum tá. Um teir hevdu kent til føroysk viðurskifti, hevdu teir ikki úttalað seg soleiðis. Tað sum vit hava at avgera í hesum máli, er tað, sum rætt er, og síðani innanka tað fyri veljarnar. Aðrenn nakað sker, so mugn Føroyingar til valg. Men eg gangi út frá, at tað einki sker fyrr enn føroyskir logtingsveljarar hava úttalað seg. - - Annars skal eg gera nakrar bemerkningar viðvíkjandi úttalilsum um grundlógin geldur ella ikki fyri Føroyar. Grundlógin av 1866 og 1915 hevur altíð goldið fyri Føroyar. Patursson, sum er forari fyri sjálvstýrispartinum, hevur eisini verið ríkisdagsmaður. Um hann helt, at grundlógin ikki galt, so var tað ódømi av honum at stilla seg til ríkisdagsmann. Í 1915 stóð valgið bara um grundlógina, og sjálvstýrið kastaði seg inn fyri at stemma fyri henni. Og Mortensen knipsaði ikki eingang í lummanum, tá hann stemmaði fyri henni. Hann segði eitt orð. Hann segði ja. Og tó segði tingmaðurin í Kirkjubø, at valgið tá stóð millum samband og sjálvstýri. Álíkavæl sendi sjálvstýrið mann niður á ting at bokrefta grundlógina. Vit hava notið allar tær rættigheitir, sum vit eiga eftir grundlógini. Tað er merkiligt, at mann í hesum spurningi ikki vil leggja vekt á, hvat Grundtvig hevur verið í aðrar máttar. Sum politikkari var hann ikki stórur. Men hann hevur berikað danskan litteraturr og var ein stórur sálmadiktari. Og tó leggja menn her í salinum so nógva vekt á hansara politikk. Hann var storstur í litteraturinum og hann yrkti sálmar, sum vóru líka góðir sum teir, sum prógtin og Patursson hava yrkt. Mortensen sigir, at tað var ikki ivi um at grundlógin galt fyri Føroyar. Mortensen var fjlfriðs við grundlógina. Hann segði ja til hana.
Táið su Edw. Mortensen kom inn uppá

skattaviðurskiftini, so fáa vit leyligheit til at tosa um tað; táið skattalógin kemur til viðgerðar. So nevndi Edw. Mortensen, at hann helt tað vera beint at royna at fáa løgtinginum fullmakt til at geva lógir. Tað er grundfalskt, at tey dømi, Edw. Mortenson tók til, geva løgtingi nakra myndugheit; nei, men tey geva regeringini sína myndugheit, ið ríkisdagurin annars hevir; tey geva ikki løgtinginum nakað sum helst lóggávuvald, løgtingið hevir tað sama lóggávuvald, sum tað altíð hevir haft, nemliga einki. Men eg má siga, at nær dámar fult so væl, at hetta er lagt í hendurnar á ríkisdegnum. Skúlamálið er komið aftur frá regeringini, og sjálvstýris menn eru ikki tilfreds, men her hevir jú netupp ríkisdagurin givið sína myndugheit til regeringina. Edw. Mortenson kann ikki framføra eitt einasta dømi uppá, at løgtingið hevir fingið yvirdrigið lóggávuvald, hansara framstilling er grundfalsk. Tað kann nú ikki nytta at tosa við hrr. Mortensen, hann er flýddur, sum hann plagar og hansara partanem við honum, og hopi, at táið nú eitt valg hevir verið, at veljararnir so hava hildið dóm yvir sjálvstýrismonnum, so at aftaná valgið tað ikki vera fleiri sjálvstýristingmenn her í salinum enn nú. Eg haldi lítið um sjálvstýrismenn, men tað kann vera, at teir eru so úsaligir, at teir lystra Tingakross, tá hann biður teir ikki vera í salinum, táið og tali. Og nú tora teir væl ikki annað, nú er jú blaðstýrarin av Tingakrossi komin her at referera, og situr her í salinum og ansar eftir teimum. Edw. Mortenson citeraði nakað úr landstinginum, hvat justitsministarin hevði talað; hann talar netupp fyri at geva regeringini eina bestemta myndugheit, regeringin vil spyrja løgtingið, tað vil ríkisdagurin eisini. R. Rasmussen talaði um Monrad, um at hann hevði haft eina óholduga hond, hann fortaldi, at hansara óholduga hond fordi til, at Danmark minkaði. Vit hava danskar ministrar, ið liggja okkum nógv nærri, ið hava minkað um Danmark, selt burtur av Danmark, hví finnast R. Rasmussen ikki at teimum. Eg vil siga tað, so eingin skal misfata meg: eg sikti til tað núverandi danska ministerium. Monrad er sikkurt ein av teim mest betýðiligu politikarum, nøkur betýðiligur enn hinir menn, ið her eru nevndir, nógv meira betýðiligur politikari enn Grundtvig, Tscherning og A. S. Ørsted. So segði R. Rasmussen, at Føroyingar, táið grundlógin kom, ikki vóru búnir til grundlógina; hvaðani veit R. Rasmussen tað? Eg trúgvi, at teir tá sum nú stóðu fult út uppá hædd við aðrar menn. Niels Winther, hann er vorðin róstur so nógv av sjálvstýrismonnum, hann tykist at hava verið rættuliga tilfreds við, at Føroyar komu inn undir grundlógina. R. Rasmussen meinar, at Danir vóru búnir til grundlógina, at Íslendingar vóru búnir til at siga noi til grundlógina, og kortini hugsi eg, at Føroyingar altíð hava staðið minst líka frammúliga sum bæði Danir og Íslendingar. Eg meini, teir vóru nógv klókari enn Íslendingar, at teir tóku ta støðu, teir tóku, og um vit nú fara at broyta okkara støðu í ríkinum, meini eg, at okkara forfedrar vóru nógv klókari enn vit. So talaði hann um amtmannin, at hann var sum undirkongur í Føroyum, tað er hann ikki nú; løgmanstíðin, hann heldur so nógv um, ja, um hana vita vit jú allir, at tá vóru tingmennirnir ikki vorðir meira enn at teir vórn skírdir rossleypar. Vit hava rossleypar enn, monn ið líkjast teimum, enn teir, ið rýma út, táið ein mótstandari talar, tí teir ikki tora at hoyra, hvat hann sigir. R. Rasmussen talaði so nógv um, hvat yvirrættssakførari Jespersen hevir sagt. Várharra kennir okkum allar, — og kenni nú ikki Jespersen; eg eri nú føddur danskur statsborgari; og havi beskeftigað meg nógv við danskan politikk, og eg havi ikki kent Jospersen, og eg trúgvi ikki, at eg havi hoyrt tann mann nevndan niðri í Danmark heldur millum politikarar. Hor verður so nógv lisið upp úr »Færøsk Politik«, hvat hann hevir sagt, og hvat hann hevir sagt tað gleðir mog, at so nógvir nú eru farnir at keypa sær bókina, so er vón um at hon skjótt verður útsold, og so eru vit frýir fyri hana. Tann bókin er jú soleiðis vorðin, at hon inniheldur eitt program, ið maðurin. ið hevði skrivað hana, gokk frá, táið hann skuldi veljast; hann vildi redda sítt mandat. Hasir menn, ið tá útlaðu sog, áðrenn vit fingu ordnað akkara kommunalu viðurskifti, teirra úttalilsi hava ikki minstu vekt. R. Rasmussen segði, at Føroyingar hava sovið, hann tordi ikki siga tað á Gotueiði, og haldi tað vera tungt at hoyra R. Rasmusson tala um, at Føroyingar hava sovið. Um menn sum R. Rasmussen skuldu borið okkara oyggjum uppi, hvussu skuldi so verið vorðið, um tann fíð upprennur, tá fara vit út á sjógv. Og tá so ein maður sum R. Rasmussen sigir, at Føroyingar hava sovið, so grína vit at tí, vit sum kenna R. Rasmussen. Tað er merkiligt at brúka tað sum dømi um, hvor ið er vaknaður ella ikki, um maður er fyri hesari sak ella ikki, um mun er, sum nú sigst, nationalur ella antinationalur,

sum sambandsmenn boskyldast fyri at vera. Eg minnist aftur í tíðina, at teir menn, ið nú standa fremst í sjálvstýris flokkinum, eftirliknaðu Edv. Brandes, hann kann man ikki rokna fyri at vera sorliga nationalan, og teir hánaðu og spottaðu teir nationalu; tá hava teir væl sovið. R. Rasmussen sigir, at Effersøe hevir lagt vissar Føroyingar undir at vera danskhatarar. Eg kann bara vísa á, at menn, sum í «Fuglafrauas» sínari tíð fremsottu úttalilsir, sum blivu stemplað sum danskarhatandi, nú sita her í løgtinginum millum aðrar sjálvstýrismenn í betýðandi stillingum, ja teir eru av sjálvstýrispartíinum settir sum tillidsmenn á teimum viktugasta umráðum. Er hetta útslag av danskarhati ella ei? Føroyafólk fer at avgera tað. Patursson tosar um, at táið sambandið vann sigur í 1906, so var tað tí tá var komin ræðsla á fólk. Jo, eg má siga, at alt tað ið nú kemur fram vísir, at Føroyingar hava haft góða grund til at ræðast fyri, at sjálvstýrispartíið vildi føra okkum út í eitt óføri, viss tað ikki hkkast sambandsveljarum at seta ein stoppara fyri tí.

Rasm. Rasmussen siteraði ein mann, sum hann kallaði Jespersen — eg kenni ikki henda Jespersen og veit ikki, hvat hann hevur at týða — og seinri segði hann, at hvat týdning okkara ríksdagsrepresentatión kundi hava, tað hevði hann klárlagt. Eg havi ikki hoyrt eitt orð um tað. Tað er jú týðiligt, at tað er eitt viktugt, ja eitt tað viktugasta band, sum knýtir Føroyar til Danmark; tað hevur til tíðir verið váttaligt, ja omtá til stóran skaða sum tá tingmaðurin úr Kirkjubø sat í fólkatinginum, men viss Føroyingar velja sær heldigar menn at senda niður, so er hetta bandið til stóra nyttu bæði fyri okkum og meginlandið. — Rasmus Rasmusson vardi seg ímóti, at tann maður, sum var sendur á ting í 1915, skuldi hava bundið sjálvstýrismonnu í teirra stoðu til grunnlógina. Nei, teir kunnu jú ikki bindast, teir, sum stemma fyri einum fár og nasta ár stemma teir beint tvørtímóti. Men teir ótu tó at hevt givið hesum tingmanni teirra ordrar til at taka forbehold yvir grundlógini; tað hava teir ikki eingong yvirskt av honum.

Eg trúgvi ikki, at Patursson vil taka konsekvonsirnar av tí hann segði um at fyri tað nakað eina ferð var gjort galið, so skuldi tað absolut beinast aftur, f. ex. viðvíkjandi festigerðunum. Um Kirkjubogarð hevur sorinskrivari Andersen soleiðis víst á, at ein annar maður í sínum tíð hevur fingið henda garð um tann familjan, sum av rottum átti at haft hann. Eg vil yvirskja, at hr. Patursson nú vil gera sum hann sigði og lata hesa familjuna fáa garðin aftur. Tað má hann gera, viss hann livir sum hann lærir.

Nú liggur grunnlógin fyri her á tingi, sigur Patursson. Tað veit og einki um: hon er í hvussu er løgd her á ting. Hvorki ríksdagur ella regering hava fyrilagt okkum nakra grundlóg. Tað er eisini forkert at siga, at teir menn, sum skuldi senda andragandi um grundlógbroyting, hava sagt tað inná ting; tað hava teir jú ikki. Men í hvussu er má hetta ikki ganga fyri tað, at grundlógin er fyriløgd okkum; tað hava vit ongansumhelst rætt til og tað fáa vit ikki soleingi vit hava ríksdagsrepresentatión til folags við Danmark. Broyta vit tað forbuldið, so er heldur eingin grund til at fyrileggja grundlógina meir fyri okkum.

Vit eiga at svara í hesi sak sum minnitalið fyrislær. Studentarnir siga at rættur og pliktir eiga at fylgjast; teir vilja hava grundlógina broytta fyri at fáa løgtinginum lóggávuvald, men tað er ikki ein sovorðin broyting sum tann hr. Mortensen meinar við, at teir tilsikta. Tað vilja teir ikki ganga inn uppá, tað uppfyllir ikki forútsetningarnar hjá studentunum. Eg havi víst á hvørjar pliktir vit mugu pátaka okkum um vit skiljast frá Danmark, sum nú letur o. u. eina hálva millión til okkara árliga: tann forútsetningurin er ikki uppfylltur, og vit kunnu so heldur ikki ganga tann vegin. Tilsíðst anbefala vit at úttala okkara gleði yvir, at Danmark nú er blivið stórri. Tað vilja hini minnitalini ikki. Tí teir hava eisini hýtt seg sundir í eitt stórri og eitt minni minnital — av taktiskum grundum. Hr. Mortensens veljarar hava antakiliga ikki so gott fordoyilsi sum hinir, teir mugu hava slakari kost.

So brixlar Patursson hr. Effersoe, at hann hevur skírt sjálvstýrismenn separatistar. Hertil svaraði hr. Effersoe, at separatistare var nitt milt úttrykk fyri tí virkan, sjálvstýrismenn nú hava fyri. Tað kann vera spursmál, um teir vilja skilja okkum frá Danmark, men at teir ætla at separera okkum, tað vilja teir vist ikki benokta. Tá so Patursson hevur sagt, at Effersoes virkan er ein skomm fyri Føroyar, so er tað rætt nokk, sum hr. Effersoe segði, at tað var lutt at visa á, at hr. Effersoes virksomheit er tiltikin í ríksdegimum líka til denna dag sum aldrilis útmerkað: og skal bara nevnu, at hann var valdur til næstformann í fólkatinginum og hevði hann verið her nú, so var hann

l. formaður. Men eg má leggja aftrat, at tað, at ein maður sum Patursson skal troysta sær at siga slíkt, tað er nógv fyri mig at hoyra, sum veit um hvussu Jónines Patursson hevur borið seg at niðri í Danmark. Eg skal ikki siga meir.

Edv. Mortensen: Eg siggi onga grund til at nerta við nakað sum helst av tí, sum hesin seinasti talarin kom fram við; eg vil bert siga nøkur orð til Effersøe. Hann helt fram, at eingin av hesum monnum, sum nevndir eru á tí grundlóggevandi ríksdeginum í 1850, úttalaði seg ímóti, at Føroyar skuldu vera undir grundlógini á sama hátt sum Danmark, men at tað einans var skeivt, at Føroyingar ikki vóru spurdir frammanundan. Tað er nú ikki so. Tað framgongur týðiliga av forhandlingunum, at fleiri av hesum monnum hildu bestemt, at Føroyar ikki áttu at vera undir grunnlógini eins og Danmark. Fyrst úttalar Tscherning síðu 49: »Dersom vi paatage os at udgive den Art Love, som her vil blive Spørgsmaalet overfor Færøerne, saa begive vi os ind paa et fremmed Gebet« . . . »Vi faar bare Stumper af Færinger, men vi faar ingen Færinger derudaf«. Hann vísir á at lóggávuvaldið kann ikki skipast eftir somu reglum fyri Føroyar sum fyri Danmark. Seinri sigur Grundtvig m. a.: »Hvad der i mine Øjne er vigtigt ved Spørgsmaalet om en Folketingsmand og en Landstingsmand for Færøerne, det er hvad Lovgivningen paa Færøerne angaar; vi vide, at det hidtil er bestemt efter Indstilling fra Stedet selv, hvilke af Danmarks Love der skal gælde for Færøerne, og dersom det altsaa skal være Følgen af, at Færøerne bliver, hvad man kalder repræsenterede i begge Ting, at det nu ikke længer skal afgøres fra Stedet selv, men her i Tinget paa fri Haand, hvilke Love der skal udstrække deres Gyldighed og Virksomhed til Færøerne, se da ansør jeg det rigtignok for meget galt«. Grundtvig helt, at tað var skeivt, at lóggávuvald viðvíkjandi Føroynum skuldi vera á ríksdaginum. Soleiðis er tað eftir grundlógini. — Her meini eg, at eg havi peikað á tvoir menn, sum hava úttalað seg ímóti, at vit skuldu koma inn undir grundlógina. Effersøe helt, at tað var undarligt, at eg í 1915 ikki tók forbehold. Persónligt var tað eiki undarligt; tí eg hevði í mínum valguppropið sagt, at eg vildi stemma fyri grundlógini. Men nú nøn stemmar fyri eini lóg, so hevur mann ikki bundið seg til ikki at vilja broyta hana. Effersøe hevur jú fyrr stemmað fyri eini lóg, og nokur ár aftaná hevur hann stemmað fyri at broyta hana. Eg havi greitt frá, hví eg stemmaði fyri grundlógini: Tí hon betýddi eitt demokratisk framstig fyri danska ríkið. Og hvat kundi tað nytta, um eg tók forbehold. Tað var jú alt avgjørt frammanundan, at ríksdagurin var upploystur. Ríksdagurin kom so saman aftur einans til at bekrefta tað, sum gjørt var. Har kundi tá ikki vera nakað fyri meg at gera, og tað var eingin grund fyri meg at halda nakra roðu um Føroyar tá, og enn minni, tí eg halda, at lóggávuvald kunnu Føroyar í vissar mátar fáa undir grundlógini. Men tá eg havi verið við at seta hetta uppskotið fram, er tað tí, at sambandsmenn halda, at vit ikki kunnu fáa lóggávuvald undir grundlógini. Tá ríksdagurin kom saman í 1915 hildu orðførararnir fyri hvørjum partii røður, og so varð stemmað. Tað hevði sæð undarligt út, um ein tingmaður tá vildi reist hesa suk í ríksdegi. Tað er merkiligt av Effersøe at siga, at eg havi staðið við hondini í lummanum og gjørt eitt knips. Tað kann vera, at Effersøe brúkar slíkan sið. Hann plagar ísalfall at hosta. Stundum snýsir hann við.

O. Effersøe: Det var bedre, om Mortensen den Gang havde taget et udtrykkeligt end et stiltiende Forbehold. Saa havde man forstaaet ham bedre, og saa havde han staaet i Samklang med, hvad de fleste af hans Vælgere vilde. Med Hensyn til det, som staar Side 49 om Tscherning vil jeg henlede Opmærksomheden paa, at der ikke tales om Grundloven men om Valgloven. Og naar Side 64 Grundtvig under sin Tale, saa siger han: »Hvad enten man bruger den Fremgangsmaade, at der skal være Repræsentanter i Folketinget for Færøerne eller ikke, saa bliver det dog efter Indstilling af et Lagting eller fra et eller andet folkeligt Samlag paa Færøerne selv, at vi tage Beslutning.« Og saaledes er det. Det er Lagtinget, som sender Indstilling, og Beslutning tages af Rigsdagen. Jeg vil bede d'Hrr. læse Side 62 og ogsaa Side 64.

J. Patursson: Effersøe sigir, at hesir donsku menn hava ikki sagt, at grundlógin ikki skal galda fyri okkum. Tað er heldur ikki framhildið her, men tað er framhildið, at hon ikki skal gerast galdandi fyrr enn Føroyingar hava úttalað seg. Men tað var tann stórri feilurin, at Føroyingar ikki vóru alspurdir. Nú eru líkindi til at spyrja tingmonnunar um, hvat teir nú halda. Sambandsmenn halda, at feilurin skal verða standandi. Effersøe sigir, at ráðini skulu koma úr Føroyum og ríksdagurin skal taka avgerðina. Á tí grundlóggevandi ríksdegi

var ikki talan um lóggevandi men ráðgevandi logting í Føroyum. Tað sama var tilfeldi viðvíkjandi Íslandi. Í 1874 hava Íslendingar fíggjarlóg saman við Danmark, men seinni fær Ísland bæði lóggávuvald og fíggjarvald. Og vit meina eisini, at vit skulu fáa lóggávuvald. Effersøe sigur, at tað var beint, at hann eyknevndi okkum «separatistar» í ríksdeginum. Hann sigur, at vit høvdu einki navn. Vit høvdu «sjálvstýrið» til navn. So sigir Effersøe, at tað sást at vit vóru separatistar. Men tað sum vit vildu í 1906 var ikki at separera okkum frá Danmark. Vit vilja hava nøkur mál fyri okkum sjálvar, t. d. veg- og havnarmálið. Og tí vilja vit hava atgongd til at áleggja ymsar skattir. Hetta kann ikki reiðiliga kallast at separera okkum frá Danmark. Hetta veit Effersøe, og tó at hann kendi okkara programm, so framdregur hann tað á danska ríksdeginum, at vit eru separatistar. Hann kendi okkara programm og visti, at har stóð, at vit vilja hava tað sjálvstýrið, sum vit kunnu koma til í samjn við ríksdagin. Tað var tí óbeint av Effersøe at koma við slíkum. Og hann nýtir eisini onnur orð og avmálar okkum so svartar, sum hann kann. Vit høvdu lúmskar ætlanir og tílíkt. Og alt hetta meðan hann veit, at vit vóru aldeilis forsvarsleysir har niðri. Í fyrstuni vildu Danir ikki trúgva hansara orðum. Men tað kom so við og við. Tann spillandi tungan vann. Tað vant alt meir og meir uppá seg. Og nú koma vit tað út um alt Danmark: Vit eru separatistar, vit hata Danir, vit vanvirða danskt mál, og tann vegin. Og alt hetta fáa vit, tí vit vilja lívga um okkara egna og gera tað vit kunnu fyri okkara land. Effersøe hevur ta fyrstu ferð, hann var valdur til ríksdagsmann borið boð inn á ríksdagin, sum vóru alt annað enn hóskandi fyri ein føroyskan umboðsmann.

O. Effersøe: Patursson kan ikki hava været tilstede, da Mortensen talte, da Paturssons Udtalelser er i Strid med Mortensens med Hensyn til, om gode Mænd paa Rigsdagen i sin Tid ønskede, at Færøerne skulde komme ind under Rigsdagen eller ikke. Hvorledes kan Patursson give Studenterbrevet sin Tilslutning, naar der siges, at fire danske Mænd stod paa, at Grundloven ikke skulde gøres gældende for Færøerne? Med Hensyn til «Separatisterne», saa er hele Sagen den, at Patursson lægger en anden Betydning ind i Ordet end jeg har lagt, da «Separatisterne» ikke betyder det samme som Adskillelse. Med Hensyn til Partiets officielle Navn, som havde Sambandspartiet i lang Tid havt sit Navn «Sambandspartiets» for der forelaa noget Navn for det andet Parti. Naar man ikke kan klare sig, saa kaster man sig over underordnede Punkter. Men det gælder ikke over for Folk, som har tilstrækkelig Forstand.

Edv. Mortensen: Tá mann lesur, hvat danskir menn hava úttalað á ríksdegi, so halda teir, at tað ikki aleina var skeivt, at Føroyingar ikki vóru eftirspurdir, men fleiri av teimum meina, at nógv bestemmilsir í grundlógini ikki hóska fyri Føroyar. Tað vóru teir donsku menn, ið meintu, at tað ikki bert var skeivt, at Føroyingar ikki vóru spurdir, men eisini, at tað var skeivt; at grundlógin kom at galda fyri Føroyar, tað framgongur klárt av teirra úttalilsum, og tað haldi eg fast uppá, um so sýslumaðurin úr Súðuroy fær nakað annað burtur úr teirra úttalilsum. Okkara meining er, at Føroyingar sjálvir skulu hava loyvi at avgera, um vit skulu fáa lóggávuvald ella ikki; minnitalið vil ikki tað; teir siga *skal*, teir vilja halda okkum, hvar tann danski ríkisdagurin setti okkum í 1849.

J. Patursson: Hr. Effersøe má hava misskilt meg, tá hann sigir, at Ørsted ikki hevir meint annað enn, at grundlógin er galdandi fyri Føroyar; tað sigir hann jú sjalvur: »Men jeg kan ikke antage, at Grundloven ligefrem er anvendelig paa Færøerne, da disse ikke er nævnte i samme, og der intet Hensyn til Færøerne er taget under Forhandlingerne om Grundloven, ligesom det ogsaa er vist, at de i Lovsproget ikke indbefattes under Danmark. – – Táið hrr. Effersøe sigir, at hann legði aðra meining í orðið separatist enn eg, tað trúgvi eg ikki. Tann meining við orðinum, sum Effersøe hevði, var óivað tann, ið kom at vera kend í Danmark tá, og er har enn: at vit skuldu vilja skilja okkum frá øllum, ið eitur danskt. Vit kalladu okkum sjálvstýrismenn, íðrenn teir kalladu seg sambandsmenn, teir tóku teirra navn úr frá teirri meining, at teir vildu siga, at mótstøðumenn teirra vilja skiljast frá Danmark.

O. Effersøe: Diskussionen drejer sig her om, hvorvidt danske Mænd i sin Tid har anbefalet at give Færøerne lovgivende Myndighed eller ikke. Det indrømmede Hr. Patursson selv, at de ikke havde, og det fremgaar klart af Citaterne. Hr. Patursson mener, at jeg mødte Modstand nede i

Folketinget ved mine Taler; jeg kender det ikke; jeg vil bede ham nævne blot et Navn, der kan støtte hans Paastand. Jeg kan saa tydelig mindes, at da jeg havde holdt min første Tale i Rigsdagen, blev den fra alle Sider mødt med almindeligt Bifald.

A. Samuelsen: Um hrr. Mortensen hevði verið til staðar, tá eg talaði í áðni, vildi hann vitað, at eg vil netupp gera mítt til, at føroyskir veljarar skulu kunna taka stilling til hesda spurning. Fyrr verður eingin grundlógarbroyting, áðrenn eitt nýtt løgting hevir uppaftur samtykt eina grundlógarbroyting. Táið tingmaðurin úr Kirkjubø sigir, at hrr. Effersøe helt talurna í 1907, so er tað skeivt.

Poul Niclasen: Edw. Mortensen helt fram, at hann kundi ikki væl skilja, at frisinnaðir menn í báðum portum ikki stemmaðu fyri hesum her. Men vit hava ein annan hugsunarhátt um hetta, vit halda ikki hetta vera tann beina veg, tí kunnu vit ikki stemma fyri tí. Táið R. Rasmussen segði, at vit vilja seta garð fyri, at Føroyingar í framtíðini kunnu úttala seg um teirra statsrættarligu støðu, so er tað ikki beint. Hvat ið er sagt um sýslumann Effersøe her á tingi, so má og siga, at eg havi ferðast nógv niðri í Danmørk og hvar eg enn havi verið har, havi og hert hoyrt gott um hrr. Effersøe.

O. Effersøe: Jeg mener ikke, at det er rigtigt, at vi faar Sagen lagt saaledes frem, at vi faar en Løfteparagraf; men lad os faa Sagen saaledes til Behandling: vil I Færinger have en Grundlovsændring nu eller ikke, vil I beholde jeres nuværende statsretlige Stilling eller prøve noget aldeles nyt og ukendt — saa er jeg rede til at tage et Valg.

J. Patursson: Eg vil bert sláa fast, at tað er úttalað á ríkisdegi, at grundlógin skuldi ikki gelda í Føroyum utan Føroyingar sjálvir vóru spurdir. — Viðvíkjandi tí, at menn ikki góvu hrr. Effersøes fyrstu talum so mikið gætur, sum hann sjálvur sigir frá, so kann eg vísa á, at í 1907, tá ríkisdagsmennirnir komu til Føroya, tá tyktist J. C. Christensen ikki at hava so ógvuliga nógv yndi til Effersøe, tað fremgekk av teirri talu, hann helt til mín umborð í skipi ríkisdagsmannanna á Tvøroyri. Men tað er jú ikki at ivast í, at táið sovorðið, sum hrr. Effersøe legði okkum sjalvstýrismenn undir, verður tikið so tráliga upp aftur ár undan ári, so verður tað at endanum tráð, sjálvt foir radikalu tráðu at endanum, at vit sjálvstýrismenn virkuliga hafaðu alt danskt og vildu skiljast frá Danmørk.

Edw. Mortensen: Vit eru ikki bangnir fyri at ganga til valg uppá hetta her; men skulu vit ganga til valg uppá lyftigreinina, so koma vit ov seint, tí hon skuldi vera samtykt seinast í oktober, og tað verður eitt stórt apparat at seta í scenu, at tann danski ríkisdagur má upplysast eina extra ferð bert fyri okkara skuld. Hetta mátti heldur ikki nýtst at føra til veljaranna við, allir Føroyingar máttu vera samsintir um hetta. Hvat ið so skal gerast eftanú lyftigreinina, tað eigir at fyrileggjast veljarunum.

N. Debess: Eg dugi væl at feta, at A. Samuelsen og Effersøe nevðugliga vilja hava eina slíka grein í grundlógina, tí hert hon verður sett har, er ein møguligheit fyri, at tann politikkur teir forfekta, skal ganga sín undirgang ímóti. Táið A. Samuelsen talaði um, at hetta skal fyri veljarunum, so ljóðaði tað sum ein hóttan. Eg veit ikki hvussu A. Samuelsen hevir borið seg at yvir fyri sínum veljarum; múnir veljarar eru hevístir veljarar, ið og ikki eri bangin fyri, at um hetta verður lagt fram fyri teimum, so samtykkja teir í hesum. Viðurskiftini eru øðrvísi nú enn í 1906, og úrslitið úr einum valgi verður kannsla øðrvísi enn A. Samuelsen hopar.

J. Poulsen: Det var kun et lille Spørgsmaal, jeg vilde rette til Hr. Patursson. Han har nu flere Gange fortalt os, at Færinger i sin Tid nægtede at sende en Repræsentant til Stænderforsamlingen. Hvorledes har de nægtet det, og hvem har svaret paa deres Vegne?

O. Effersøe: Hr. Patursson omtalte, at jeg havde mødt Mødestand i Folketinget. Jeg opfordrede ham til at godtgøre det, men det kunde han ikke. I Stedet for giver han en Historie til bedste om noget, Hr. J. C. Christensen skal have sagt i 1907 ombord paa et Skib. Ja, det er naturligvis nemt nok at fortælle saadan noget, da ingen har hørt det. Men jeg tillader mig imidlertid at mene, at J. C. Christensen ikke har nøjtet sig paa den Maade. Derimod fortalte en af Rigsdagsmændene, der var til Stede sammen med Hr. Patursson ombord paa det samme Skib, at Hr. Patursson havde sagt disse kome Ord: Vi ere

danske og vi ville vedblive at være danske! Jeg kluklo.

J. Patursson: Eg trúi at eg diskuterandi við ein mann, nú hoyri eg, at eg diskuteri við eina. hann. Her hevur altso ein olla annar smíðað eina sogu fyri hrr. Effersoe; eg gangi útfrá, at hann upplýsir, hvør hesin søgusmiðurin var. Sjálvsagt havi eg aldri brúkt tey orð, so tey skuldu forstandast sum vit ikki í ollum førum vildu vera Føroyingar og hava sjálvstýri heima hjá okkum sjálvum. Annars kundi tað verið forvitnisligt at bovið fram mangt og hvat, sum hendi har umborð, men tað skal eg lata verða. — Tingmaðurin av Strondum spyr nær Føroyingar hava noktað at senda mann til standarforsamlingina. Í 1846 sendu Føroyingar bønarbræv til standarforsamlingina — ikki um at fáa ein mann hoðani settan har — men um at fáa ting heima í Føroyum. Teir hildu ikki, at tann representatión, teir hevdu, dugdi nakað viðari. Seinri, í 1847 og undir grundlógforhandlingunum 1848 var sent boð frá donsku stjórnini til Føroyingar og spurt, hvussu teir vildu forhalda seg til standarforsamlingina og valgini til fólkatingið. Har varð tá hildið eitt langt ting í Havn, sum resulterandi í eini samtykt um, at men ikki helt tað vera beint, at Føroyingar blivu representeraðir á standarforsamlingini, tí tað hóskaði ikki fyri okkum.

P. Nielsen: Edward Mortensen meinti ikki, at tað bleiv tíð til at upploysa logtingið uppá hendan spurningin. Eg trúgvi ikki, vit behova at kvíða fyri tí. Eftir ollum, sum fyriliggur, kemur grundlógbroytingin ikki at fyriliggja fyrrenn seinast íár.

O. Effersoe: Det var ikke synderlig vittigt af Hr. Patursson at sammenligne mig med en Høne. Jeg sagde ikke, at jeg klukkede, men jeg kluklo. Ellers kan jeg oplyse Hr. Patursson om, at det var Provst Petersen, der fortalte mig, hvad Hr. Patursson havde sagt, og saavidt jeg mindes Hr. Nørhavo ogsaa.

Sambandspartiet er altid klart til at modtage Valg paa Grundlovsspørgsmaalet, men vi kræver, at det lægges klart og tydeligt frem for Vælgerne, som disse stilles overfor netop dette Spørgsmaal og intet andet.

J. Patursson: Eg eri nakað tunghoyrdur; tað tyktist mær sum Effersoe segði, at hann klukkaði. Men kanska hann «klukloe», tí hann hevði hoyrt somógv klukk tann dagin. Í hvussu var hvørki «klukkaði» ella «klukloe» J. C. Christensen, tá hann helt taluna fyri mær.

O. Effersoe: Jeg havde ikke «klukket» for meget, thi jeg var totalafholdende.

Edw. Mortensen: Eg vil spyrja og eg vænti at fáa svar: Um logtingið verður upployst uppá grundlógspurningin og veljararnir gava okkum rætt, vil so sambandspartíið boyggja seg fyri tí?

R. Rasmussen: Eg vil bert eina ferð enn framføra, at mangir góðir danskir menn umframt hin «sælle Ørsted» sum Effersoe kallar hann, hava framhildið ferð eftir ferð, at grundlógin ikki hóskaði og ikki átti at anvendast í Føroyum utan víðari sum hon var. Ja, Ørsted vildi enntá gera avvíkilsir frá útgávilsi av valgrættinum utan hensýn til grundlógina. At teir tó tuttu okkum grunnlógina er ikki at ivast í. Men hr. Effersoe letur seg nú einaferð ikki yvirbevísa . . formuftslutningar virka ikke uppá hann. Hann blívur við at siga, at hesir menn vildu hava lógina galdandi fyri Føroyar eins og Danmark. Væl er tað ikki avgerandi fyri okkum, hvat danskir menn úttalaðu tá, tað kemur sjálvsagt nú ann uppá, hvat vit meina sjálvir, men ein ómetuligur stuðul er tað fyri okkum kortini at hesir menn, teir fregastu Danmark hevur átt, hava úttalað tað sama sum vit nú, og at vit kunnu konstatera, at teirra úttalilsir hava verið rætt.

Eg veit ikki, hví sambandsmenn kunnu tvívla um antin tað er okkara rætta meining, at logtingið skal hava lóggávuvald. Tað er sjálvgivið, at teir menn, sum sóta henda spurningin fram, meina tað. Og tá hr. Effersoe og hansara felagi so stærkt ynskja at valgið skal standa á henda spurningin, reinan og óbalsameraðan, so ynskja vit tað sama av teimum; her nýtist ikki meir enn tað, vit hava sett fram í okkara uppskoti til grundlógarbroyting.

J. Samuelsen: Eg má siga, at vit hava yvirhøvur ikki debatterað tað ennni, sum fyriliggur. Vit hava bara snakkað um fortíðina, men tað er framtíðina, vit áttu at tosa um. Tá og framdrógu hin finansiella spurningin tordi eingin tala um hann; teir bara tosa um, hvat deyðir menn hava sagt. Men eg forstandi væl, hví sjálvstýrismenn ikki vilja kasta inn uppá tað økonomiska . . tað er manliga tað okkara fólk ræðist. Eg vil ikki vera við til at lata deyðar danskar menn avgera hetta

spursmálið, eg vil lata livandi Føroyingar og livandi danskar menn avgera tað. Hvatið upploysning av løgtinginum viðvíkur, so er tað givið, at fyriso vítt sum regeringin er ímóti at gera nakað við hesa sak, so er eingin grund til at upploysa løgtingið, men viss regering og ríksdagur í heila tikið kann teinkja sær møguligheitina av at gera nakað við hana, ja, so vilja teir sjálvsagt útskriva valg til løgtingið og lata teir føroysku veljararnar sjálvar um at avgera spursmálið. Soleiðis vil tað koma at ganga. Hvør maður, sum hevur sunna fornuft, vil koma til tað resultat, at soleiðis vil mann bera seg at. R. Rasmussen sigir, at hesir menn høvdu sagt, at tann gamla grundlógin kundi ikki anvendast í Føroyum. Hesi úttalilsir eru skeiv, tí grundlógin hóskar væl í Føroyum. Føroyar hava gingið nógv fram undir grundlógini. — Tá so R. Rasmussen sigir, at tað ikki er tvívl um, at sjálvstýrismonn vilja hava lóggávuvald, so kann eg siga, at tað er hansara egnu talarar, sum tvívla. Eg haldi, at sjálvstýrismenn vilja hava tann sama stilling sum Ísland hevur nú. Og tað hevur R. Rasmussen úttalað seg fyri, meðan Mortensen og Patursson vilja innhalla hondan spurningin og siga, at Føroyingar skuhr standa frír. Tað ljóðar betur. Sjálvstýrismenn hava tvey uppskot: Eitt meiri radikalt, eitt meiri moderat. Men í virkiligheitini er munurin eingin, tó at mann kann fáa tað til at siggja út, sum eitt munur er ímillum. Tað sum annar parturin ikki kann fiska uppá sítt standpunkt, tað skal annar parturin kunna fiska uppá sítt.

S. P. úr Konoy: Eg skal ikki koma inn á stórpolitikk. Eg skal bara siga eitt sindur um tað síðsta punktið sum samhandlið hevur frammi á tingi í dag viðvíkjandi Suðurjútarnar. Her hevur sambandspartíið framsett eitt uppskot av nationalari natúr. Eg má siga, at um hetta uppskotið var framsett her á tingi í øðrum formi, so hevði eg ynkst at alt tingið stunnaði fyri tí. Tað er óivað, at er tað nakar partur av fólki í Føroyum, sum við vissum rætti følir gleði yvir at hosi fólk sleppa undir danskt vald, so eru tað vit í Føroyum, sum hava kompa fyri, at okkara mál skal njóta sín rætt her í okkara landi. Tað er klárt, at sjálvstýrisfólk í Føroyum følir við hesum monnum har suðuri. Men tað er mótsigandi, at samhandsmenn í ár koma við hesum uppskoti. Gleða samhandsmenn seg kanske yvir, at so nógv jørð skal koma aftur undir Danmark? Mun skuldi ikki trúgva, at slíkt uppskot skuldi koma fram frá hesi síðuni í ár. Vit hava í ár og fleiri ár trætst um, hvat tungumál hava at týða. Og vit í okkara partí hava sagt, at vit hava sympati fyri teimum fólkum, sum stríðast fyri sínum nationalitoti. Og vit hava eisini sagt, at føroyskt er talumálið her og hitt er fremmant mál. Í Suðurjútlandi er talumalið danskt og týskt er tað fremmanda málið. Nú kundi sambandsmenn sagt, at tað ikki var so stór grund til at gleðast fyri tað, at talumálið í Suðurjútlandi fær sin rætt aftur. Sambandsmenn hava jú her á tingi hildið fram, at talumálið í Føroyum hevur ein begrensaðan rætt her. Hví skulu teir tá ynskja Suðurjútunum til lukku? Men *vit* kundu við gleði ynskja teimum til lukku. Eg trúgvi, at hetta er ikki so heilt heint gjørt av sambandsmonnum. Tí nú noyðist mann at hyggja tilbakar til gerningarnar hjá teimum. Yvirfyri Føroyum hava sambandsmenn gjørt uppfatanin av tí nationala spurninginum grugguttan. Eg forstandi ikki, at klárt skoðandi danskir menn kundu finna seg í, at man brúkti ein annan máta yvirfyri Føroyum enn yvirfyri Suðurjútlandi. Viðvíkjandi fólkamálinum hjá okkum sigur danski útsendingurin her nei fyri at fólkamálið skal vera undirvísingarmál. Men tað forandrar ikki mína støðu. Og eg hevði viljað gera sambandið og Danmark uppmerksanan uppá hesi viðurskifti. Hvat ynskja sambandsmenn til lukku við? Er tað fyri jørðini sum kemur aftur ella er tað fyri ideini?

A. Samuelsen: Eg kann ikki nokta, at eg eri forharmaður um, at Konoy kemur soleiðis inn uppá hendan spurningin. Tá hetta punktið var uppsett, lugsaði eg, at her var ein spurningur, sum allir Føroyingar kundu slutta seg saman um, bæði sjálvstýrismenn og sambandsmenn fyri einmeltir at úttala gleði yvir, at okkara suðurjútsku bræður eftir at hava verið í fremmanda vald í so nógvum árum nú kundu venda aftur til móðurlandið teirra. Hettar er ein folilsissak. Og tað er tí nokk so óbehagiligt at diskutera um tað. Eg veit ikki hví Konoy kann ivast um, at vit gleðast við, at Danmark fær jørðina aftur. Hann hevur onga grund til at trúgva, at vit ikki meina tað, sum stendur í uppskotinum. Vit siga, at vit gleða okkum yvir, at hetta fólkið vendir aftur til Danmarkar. Eg forstandi ikki, at Konoy vil gera hetta í tí alvarsami tíð, vit eru í. Hann sigur, at hetta hóskar ikki fyri okkum. Tí vit upptreda annarleiðis í tí føroyska spurninginum. Tað er ikki satt,

Forholdini í Suðurjútlandi og forholdini í Føroyum kunnu ikki samanlíknast. Meðan Suðurjútland bleiv slitið frá Danmark, er tað ikki so við okkum. Danmark hevur ikki slitið okkum til sín. Og Konoy veit, at stillingurin viðvíkjandi málinum í Suðurjútlandi og stillingurin viðvíkjandi málinum her kann ikki samanliknast. Tá Konoy sigir, at føroyskt mál ikki ljóðar í skúlanum, so veit hann, at tað er ósannheit. Konoy arbeiðir fyri, at danska málið ikki skal ljóða í okkara skúlum. Føroyskt ljóðar í skúlunum sum fag og sum undirvísingarmál. — Eg havi ikki tikið regeringsins representant í forsvar. Tað má hann sjálvur um. Men tað er órætt at siga, at vit vilja útihilda føroyskt úr skúlunum. Tá Konoy talar um tað danska málið, sum er komið inn yvir okkum, so hóskar tað við tað sum sagt er her í salinum fyrr, at danskt var eitt deytt mál í Føroyum. Tað er ikki fyrr enn ífjør, at eitt slíkt uppskot kundi viðtakast. Men hvussu er vorðið í Suðurjútlandi? Er fleirtalið har fyri týskum? Tann partur, sum vit ynskja aftur til Danmarkar, hevur einki fleirtal, sum heldur úppa týskt. Eg forstandi tó Konoy álikavel. — Tað sum hevur gjørt mær mest ilt í hesi sak, er, at vit sum í 5—600 ár heva hoyrt til Danmark, nú tá grundlógin skal broytast og alt danskt skal samlast, vilja hava broyting, sum sotur okkum utanfyri danskt ríkssamband. Tað er harmiligt, at Føroyingar netopp hava valt hetta tíðspunkt, tá Danskarar skulu gleða seg yvir, at danskt land kemur aftur til teirra, sum hevir verið undir fremmandahondum so leingi — at sjálvstýrismenn tá skulu siga: vit vilja ikki vera uppi í. Men sjálvstýrismenn hava ikki fólkið her í Føroyum við sær, teir høvdu tað ikki við seinasta valg. Men somuligari var tað, um teir høvdu valt eina aðra tíð at koma fram við hesum enn netopp nú. Eg trúgvi, at Føroyingar stemma fyri okkara uppskoti við gleði, sjálvt um hitt verður samtykt á løgtingi. Og eg trúgvi, at tað vil gleða Danskarar at siggja tað — Føroyingar hava eisini víst tað á ein annan máta — at vit gleða okkum yvir, at Suðurjútarnir venda aftur til felagsskapin við Danmark.

S. P. úr Konoy: Hesin maður gekk uttan um tað centrala, sum hann plagar, men slíkar langar talur utanfyri sakina eru onga nytta til. Her var spurningur, um her kundi gevast eitt einmalt úttalilsi um hetta av løgtingi, og eg meinti nei, tað kann tað ikki, soleiðis sum nú er vorðið.

A. Samuelsen: Tað kann gott vera, at eg kom til at halda eina langa talu, men fyri mær er hetta ein følilsissak, og eg var rordur, um ikki upprørdur, yvir hetta. Eg má siga, at vit mela okkum at stemma fyri tí, og kunnu sjálvstýrismenn lata vera at stemma fyri tí, so er tað heldagiligt.

S. P. úr Konoy: Tað gleðir meg, at A. Samuelsen kann upprorast, táið talan er um umráðandi spurningar, so kenni eg hann aftur frá gamlari tíð.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Stólasetur í Ness kirkju.

1. viðgerð.

Prósturin: Hetda sak nýtist ikki at taka langa tíð. Talan er um at fáa nokur stólasetur aftrat í Ness kirkju. Har er nógv ov fá setur samanborið við talið á teimum, ið koma í kirkju, og tað er tí ætlað at vídka um seturstalið við at pulpiturið verður longt nakað inn í kirkjuna. Harvið vinnast o. u. 35 ný setur. Eg skal mela til, at útreislan til hesa vídkan verður tikin úr kirkjukassunum.

Svimjing sum lærugrein í skúlunum.

2. viðgerð.

Prósturin greiddi frá nevndarálitinum og mælti tinginum til at samtykkja tað.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Stuðningur til arbeiðisleysar fiskimenn.

3. viðgerð

R. Rasmussen: Eg skal loyva mær at biðja tingið gera meirilutans uppskoti atkvøðu.

A. Samuelsen: Eg skal gera tað sama sum ordførarin, utan eg vil ráða monnum til at stemma fyri tí lóguppskoti, sum M. Samuelsen og eg hava borið fram, og eg vil biðja menn stemma fyri tí í so stórum máli sum møguligt, tí sakin er vanskelig og verður enn vanskeligari at gjøgnumføra, um hon ikki verður samtykt við stórum fleirfali. Sjálvt um hetta uppskot ikki verður samtykt í ár, so noyðast vit skjótt at fara nidir at gera eina sovorðna lóg, tí tíðirnar verða ikki altíð so góðar sum nú.

J. H. Poulsen: Eg eri í útvalginum og úttalaði meg ikki í gjár. Samuelsen sigir, at vit noyðast kannska at koma inn uppá hesa veg; tað er møguligt, men hesa lóg, ið Samuelsen framsetti uppskot um, er ikki ætlað at galda fyri framtíðina, men fyri ta tíð, ið farin er — nevniliga til 31 mars íár; tí halda vit hetta er oneyðugt, tí árið hevir verið so gott; men um A. Samuelsen hevði framsett uppskot um eina lóg galdandi frá december í ár til næste ár, so hevði eg stillað meg øðrvísi til spurningin.

A. Samuelsen: Eg úttalaði ígjár, at táið vit hevdu tikið tað tíðarrúm, vit hava ætlað, at lógin skal galda fyri, so er tað, tí vit hava tikið ta donsku lóg til fyridømi, men eg segði eisini, at vit, um løgtingið sluttaði seg til tankan, líka so gott kundu taka komandi vetur. Um teir vildu føroyskum fiskarum væl, so hevdu teir latið teir fingið gott av tí studningi, danskir fiskarar fingu. Hví eg ikki kann stemma fyri hesum uppskoti, er, at so leingi tey skema, sum føroyskir fiskarar eina ferð hava undirskrivað, ikki eru uppfyllt, vil eg ikki vera við til at fáa fleiri til at søkja. Eg vildi sum fólkatingsmaður fela meg frían v. h. t. tíðina og tí seta lógina at galda frá 1. oktbr. 1918. Men tað kann jú forandrast til 1919, viss løgtingið viðtekur forslagið. Meiningin var við hesi lóg at vísa, hvussu framtíðar lógir í henda rætning skuldu verða, sum Førovingar kundu hava nytta av. Hetta skuldi vera sum ein mynsturlóg.

J. H. Poulsen: Hetta forstandi eg ikki. Vit kunnu tá ikki skriva 1918, tá lógin skal galda frá 1919. Vit kunnu heldur ikki við góðari samvitsku viðtaka eina slíka lóg fyri henda veturin. Nakað annað er, at vit taka forslagið undir yvirveyilsi fyri komandi tíðir.

A. Samuelsen: Tolini kundu vit jú broytt; eg havi sett hesi tolini inn eftir uppskotinum fyri íjor. Fáa vit hesa lógina, so nýta vit hvørga av hinum lógunum, tá verður bert hin fyrsta lógin galdandi. Og tá so teir harniðri arbeiða uppá teirra dýrtíðarlóggeving, so kunna okkara ríkisdagsmenn vísa til hetta lóguppskot og siga, at vit yuskja at fáa eina sovorðna lóg.

M. Samuelsen: Tá talan hevur verið um, at tað nýtist eingin arbeiðsloysislóg fyri veturin, sum farin er, so kann tað kannska galda pláss í Føroyum, sum eg ikki kenni til, men á teimum plássum, eg kenni til, var nógv arbeiðsleysheit í vetrinum, sum fór; í mars og apríl var púra arbeiðsloysi. Tá kundi ikki hugsast um at gera nakað verðsins ting, kavi lá nógvur og ikki var útiróðrarveður; har var púra eingin fortjenasta hvørki á sjógv ella landi. — Eg haldi tað at tann maður, sum ikki vil stemma fyri hesari lóg, ikki við nøkrum rætti kann standa fram og siga, at hann vil arbeiðsmannunum og fiskarunum væl. Eg vil tí tað besta anbefala at stemma fyri hesum forslag.

J. Guttesen: Eg ætli ikki at stemma fyri hesum uppskoti, m. a. av teirri grund, at tað gongur út uppá at krevja studning fyri tað árið, sum farið er. Eg haldi ikki, vit kunnu vera hekentir at biðja stýrk fyri tað frægasta árið, sum kannska verið hevur í Føroyum. Sjálvur eri og soleiðis stillaður, at eg kundi komið imundir lógina, men eg vil heldur royna at klara meg sjálvan.

R. Rasmussen: Eg vil bestemt mótmæla tí sum Mikkjal Sámalsson fordi fram, at teir ikki hava rætt at standa offentligan fram og siga, at teir vilja arbeiðsmonnum og fiskimonnum væl, sum ikki vilja stemma fyri hesum lóguppskoti. Tað er beint hvørtímóti. Vit gera ógviliga ringt fyri fiskararnar, um vit fara at hilla teimum im, at teir kunnu fáa offentligan studning fyri tann veturin, ið fór. Tað er nærmast ómoralskt.

A. Samuelsen: Tað er aldeilis ikki tala um at hilla nøkrum nakað im. Tað kann vera, at veturin hevur verið góður sumstaðni, men hann hevur ikki verið tað fyri oll plássir. Guttesen kann kannska klára sog sjálvur, men viss allir skuldu hugsa sum hann, so kundi man jú ikki fyrisligið nakað fyri tann komandi veturin

heldur. Tað er jú ein skavankur, sum ofta nervar slíkar foranstaltningar, at menn søkja um studning, sum ikki áttu at søkt. Men hotta uppskotið er so týðiligt og klárt, at eingin kann teinkjast at søkja, sum ikki við grund kann vænta at fáa nakað.

M. Samuelsen: Tað kunnu vist vera deildar meiningar um, hvussu góður veturin hevur verið. At Guttesen kann klára seg við teimum oyrunum, hann hevur fortjent, og tí ikki vil stemma fyri forslaginum, tað er tó for snævurt hugsað fyri ein tingmann. Í lógini standur skiliga hvør ið kann fáa studning. Tað er altíð skonum at søkja um studning hjá tí, sum ikki hevur rætt til tað, og tað er eisini strafbart eftir hesi lóg. Kemur Guttesen og søkir, so verður hann straffaður. Men eg haldi meg formerkja, at her er slíkur mótvilji móti lógini, at tað ikki loysir seg at standa her og forfekta hana. Eitt kemur jú ikki longur við at snakka um hana, táið tað er avgjørt frammanundan, at hon skal drepast.

J. Guttesen: Mikkjal Sámalsson hevur heilt misfatað, hvat eg segði. Eg vísti á, at eg ikki var betri stillaður enn so, at eg væl kundi komið í betraktning eftir lógini. Hon sigur jú, at hvør fiskari ella arbeiðsmaður, sum ikki eigur meira enn 10,000 kr., er óbemidlaður; tað fer at kallast heldur vælstillaðir menn, og um teir skuldu gingið fyri einki nakrar dagar, haldi eg tað vera ósømiligt av teimum at fara og biðja um styrk. Eg veit ikki, hvussu tað hevur verið í vetur við teimum plássum, Mikkjal Sámalsson tosar um, men hann fortaldi mær eitt dømi ífjor ein dagin, vit ferðaðust saman við Mjólkabátinum, uppá hvussu dýra teir seldu sildina har norði í Sundalaginum. Teir høvdu tá eina nátt fingið uppí eini 100 eyskør av smáari sild av tí slagnum, sum 50 ganga í eyskarið av, og hana seldu teir fyri 1 kr. stykkið. Tað bleiv 5000 kr. Um ein maður ofta gev sovorðin kupp um árið, so haldi eg hann er vælhildin.

S. P. úr Konoy: Tað er heldur álvarsamt av Mikkjal Sámalsson at siga, at tann maður, ið ikki styðjar hetta lógaruppskotið, hann hevur ongan rætt at standa fram og siga, at hann vil arbeiðs- og fiskimonnum væl. Eg ætli mær at stíga offentliga fram á fiskimanna vegna, tóat eg ikki stemmi fyri hesi lóg. Til tess er hon nógv ov óskoytliga borin fram á tingi, óklár, sum hon er og ógreidd, at vit, um hon skuldi verið framd komu til at staðið ógviliga undarliga yvirfyri ministerinum. Her svevar jú alt í luftini, vit vita jú ikki eingong hvorja tíð hon skal galda fyri. Nei, latum okkum uppiarbeiða forstáilsi millum Føroyingar um hjálp til sjálvhjálp, enn bara at biðja. styrk við ongum forpliktilsum. Tað var meira samfundsgagnligt og beinari í allan máta, um vit slerdu inn uppá tey sonnu princippir, sum galdandi eru aðrastaðni í verðini, at arbeiðsmenn taka seg saman í felag, stovna arbeiðsloysiskassar, og síðani krevja studning av tí almenna. Slíkt uppelur fólk til sjálvbjargni og samanhald. Eftir hesi lóg kemur størsti parturin av okkara fólki at liva uppá offentligan styrk; skal tað ikki verða, so má onkur skyna á, hvør ið skal fáa og hvør ið ikki skal fáa. At teinkja sær til, at forstandarskapslimirnir runt um landið hereftirdags skulu ganga uppi um næturnar og ansa eftir, um tað er útróðrarveður ella ei!

M. Samuelsen: Guttesen sigir, at eg skal hava sagt tá vit báðir ferðaðust í mjólkabátinum ífjor at ein maður úr Vík hevði fingið uppí eitt eyskur av sild, og tað seldi hann fyri 70 kr. við tað, at hann fekk eina krónu fyri hvørja sildina. Tað minnist eg ikki. Men harav fylgir ikki, at allir Víkarmenn hava fingið tað. Men um Víkarmenn høvdu fingið nógvar peningar fyri sild, so vildu teir ikki koma fram við umsókn um studning. Hvat onkur maður kann hava havt til inntøku, skal man ikki leggja til grund. Tað er ikki vanskiligt fyri forstandarskapini at praktisera hesa lóg. Tað er ikki ringt at vita hvørjir menn, sum útróðrgvnir eru. Men tað er verri at vita hví ein maður ikki fer til útróðrar. At hava skil á, hvussu mangir bátar sum fara til útróðrar, tað er eitki fyri. Menn í Vík leggja seg ikki heinna fyri at spekulera í hesi lóg. Men teir menn, sum við alt sítt arbeiði ikki kunnu liva, skulu hava ein tjans í hesi lóg.

A. Samuelsen: Konoy meinti ígjár, at lógin skuldi galda fyri næsta vatur og tí kann hann ikki stemma fyri henni. Eg hildi, at Konoy mátti hava fylgt so mikið við, at hann visti, at mann á ríksdegimum hevur lóggivið fyri ½ ár í senn. Tá vit nú geva hesa lóg fyri í vetur, so gera vit líknandi lóg fyri næsta vetur. Av hesum grundum kann Konoy ikki koma undan at stemma fyri lógini. Og heldur ikki av øðrum grundum. Tí at nokrir føroyskum fiskimonnum og øðrum at fáa eitt sindur av fortjenastu bara av tí at tað er óbehagiligt

fyri forstandarskapini, tað er ikki nokk. Til Guttesen skal eg siga, at tað er ikki so at forstanda, at eingin fær undirstøttilsi eftir lógini uttan at hann eigir 10,000 kr. Vit hava sett hægsta markið til 10,000 kr., og so niður eftir. Tað er ikki talan um at geva øllum, men teimum, sum við sítt arbeiði sum familiufedrar ikki kunnu fáa 90 kr. um mánaðin. Fáa vit hetta ígjøgnum, so vil tað vera til gagn fyri fólkið. Og tað kunnu vit, um vit ikki leggja okkum í buktina fyri hesi sak. Tað vil hava fylgir.

J. Guttesen: Eg segði, at menn fingu studning, tá teir komu upp til 10,000 kr. Eg helt, at hettar var nóg so høgt sett. At Føroyingar skuldu fara og søkja sær styrk, um teir kunnu at ganga nakrar dagar ledigir, tað haldi eg ikki fer at siggja so væl út. Nú er talan um 90 kr. Um veturin kunnu menn ofta ikki koma uppí 90 kr. Men tað er møguligt, at tey beløp, teir tjena undir hetta, verða frádrigin. Skulu fólk fáa slíkan studning nú, sum her er talan um, hvussu skulu so fólk studlast, tá tær ringu tíðirnar koma.

S. P. úr Kongi: A. Samuelsen sigur, at loggja vit okkum í buktina fyri hesi sak, so kann tað føra fylgir við sær. Eg vil gjarna hava at vita, hvat A. Samuelsen meinar. Er hetta ein hóttan?

A. Samuelsen: Eg skal til Guttesen siga, at teir sum hava yvir 10,000 kr. roknaðar eftir teimum prísum, sum vóru undan krínum, teir fáa einki. Men hinir fáa so mikið, at teir skulu ikki hava minni enn 90 kr. um mánaðin. Fortjena teir 70 kr., so skulu teir hava 20 kr. aftrat o. s. fr. o. Eg hopi nu, at Guttesen vil koma og stemma fyri uppskotinum. Um tað einans vóru 20 menn, sum komu at tvingja til studning --- hví skuldu teir ikki fáa? Og so eitt annað: Vit hava tá samtykt nakað her á tingi um, hvussu vit vilja hava oina slíka lóg at siggja út fyri tann komandi veturin. Til Konoy vil eg siga, at um vit seta okkum ímóti at ordna hesa sak, so vil hetta koma í vogin, um vit næsta ár vilja fremja eina slíka lóg.

J. Guttesen: Eg haldi, at eg skilji A. Samuelsen nú. Eg forstóð hann eisini fíðni. Vit kunnu taka ein mann, sum eigir 9,000 kr. Hann eigur hús og bát til 5000 kr. og kontant eigir hann 4,000 kr. Lat okkum siga, at hesin maður hevur síðsta ár fortjent 2000 kr. Men um tað so um veturin kemur ein longri uppiloga, so hevur hann rætt til at fáa studning. Tá má sigast, at hetta eru ógviliga góð kor at liva undir.

A. Samuelsen: Um Guttesen meinar, at grønsan er fer høg, so kann hann fyrisláa 6 8000 kr. Tá vit hava sett 10,000 kr., so er tað tí, at vit ikki vilja stilla føroyskar fiskarar verri enn hvat grønsan er í Danmark. Ígjár helt R. Rasmussen, at vit vóru farnir ov lágt. Sannheitin liggur í miðjuni. Eg haldi, at tað er forsvarligt at brúka somu grensu sum í kongaríkinum.

D. J. Thomsen: Tó at tað er talað so mikið í hesi sak vildi eg biðja um orðið fyri at vísa tingmanninum úr Vík tilrættis fyri at hann sigur, at tann sum ikki stemmar fyri hesum uppskotinum vil ikki Føroya fiskimonnum væl. Tað hevur M. Samuelsen ongan sum helst rættin til at siga. Tað eru fiskarar, sum bíða eftir, at tann lóg, sum teir skrivaðu sína nøvn á skemuini til, kemur at virka her í Føroyum. Har ímóti er tað ikki sagt, at fiskararnir bríggja seg so mikið um hetta lóguppskotið, sum A. Samuelsen kemur við.

Um teir vildu føroyskum fiskarum væl, so høvdu teir latið teir fingið gott av tí studning, danskir fiskarar fingu. Hví eg ikki kann stemma fyri hesum uppskoti, er, at so leingi tey skema, sum føroyskir fiskarar eina ferð hava undirskrivað, ikki eru uppfyllt, vil eg ikki vera við til at fáa fleiri til at søkja.

A. Samuelsen: Eg haldi tað vera merkiligt, at sjálvstýrisflokkurin so at siga mobiliserar allar sínar troppar, sjálvt reservutropparnar, fyri at bera ilt upp undir hesa sak. Sjálvt hrr. Thomsen, id annars ikki plagar at fáast við annað enn skjútskassaútvalgið, sjálvt hann meinar at hava rætt til at undirminera føroyskar fiskarar. Men sjálvt um teir tosa nokk so nógv ímóti, ætli eg mer at stemma fyri uppskotinum. Táið Thomsen brigdar tingmanninum úr Nordstreymoy, at hann ikki hevir reist sakina ífjor, so má eg spyrja: reisti Thomsen hana ífjor? Tað vildi verið idiotisk at reisa hana ífjor. Thomsen vuif ikki skil á, hvussu sakin hevir útviklað seg og eg vil anbefalla Thomsen aftur at seta seg við skjútskassanum.

N. Debess: Tað sýnist logið, at A. Samuelsen verður illur, fyri tað, at sjálvstýrismenn úttala seg um hesa sak, tað má tó vera teimum loyvt og eg finni tað merkiligt, at vit ikki skulu fáa loyvi at

úttala okkum fyri A. Samuelsen. Eg vil bert siga aftrat: eg ætli mær ikki at stemma fyri uppskotinum frá harrunum Samuelsen.

M. Samuelsen: Eg skal gera eina bemerkning til Guttesen. Hann sigir, at um fiskarar nú treingja til studning, so treingja teir altíð. Ja, nógvir fiskarar hava fortjent nógv, men tað er eisini dýrt at liva, og tá ið vit hava framsett hetta uppskot, so er tað tí, at um onkur ikki tjenar nóg nógv, so kann hann liva, so skal hann hjálpast. Um Thomsen er góður við fiskararnar, so skal hann stemma fyri hesi lóg; at tosa um tey gomlu skemu, nyttar ikki spor.

Tað varð givið atkvøðu til hvørja grein fyri seg. Grein 1 og 2 vórðu ikki samtyktar og alt uppskotið fall soleiðis burtur.

Fundur hósdag 18. september.

Tryggingarverk við ein veg.

2. viðgerð.

Ordføraren (S. P. úr Konoy) greiddi frá nevndarálitinum.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Kommunulækni í Vági (S.).

2. viðgerð.

Ordføraren (R. Niclasen) greiddi frá nevndarálitinum.

D. J. Thomsen: Eg talaði eitt sindur um hesa sak við 1. viðgerð. Og nú hevur nevndarformaðurin greitt so nógv frá, at og havi ikki nógv at leggja aftrat. Tó havi eg stillað uppskot til punkt 2. Tað er av tí, at eg haldi onga vón vera til at fáa lækna í sunnara parti av Suðroy utan at bjóða honum tey somu vilkor, sum nú eru boðin Eiðis og Sandslæknanum. Eg biðji tí tingið stemma fyri mínum uppskoti, tí tað er stór trongd til lækna í hesum partinum av Suðroynni. Fólkatalið her er 2,000 og tað talar fyri at fáa lækna. Eitt annað er, at tað er so torfort at fara til lækna serliga fyri Sunnbingar og Vikarbirgis menn. Tað er ógjørligt at lenda við motorbáti í Sumba, men motorbáturin kann koma inn á fjørðin og fáa sleppt læknanum á land, tá vælmannaður bátur kemur út. Tað triðja, sum talar fyri, at lækni má fástast higar, er at tað er stór framgongi í hesum oyarpartinum og eftir føroyskum viðurskiftum er her stór trafikk við skipum og motorbátum. Eg vil takka nevndini fyri tað arbeiði, teir hava gjørt í hesi sak og biðja tingið at stemma fyri henni.

O. Effersøe: Det følger af sig selv, at efter den Stilling, som Tinget indtager med Hensyn til Spørgsmaalet om Rejseomkostninger, stemmer det nu for et tilsvarende Forslag om Rejseomkostninger og at Tinget selv svarer et større Beløb. Naar vi sender Sagen saaledes fra os, vil der ikke opstaa Vanskeligheder. Sagen er den, at Kommunerne ikke kan paatage sig vedvarende Forpligtelser uden at Lagtinget giver Tilladelse dertil. Der tales om, at Kommunen skal opføre passende Lægebolig og hvad der skal ydes fra de forskellige Kommuners Side. Derved kan der blive Tale om, at Kommunerne paatager sig en vedvarende Forpligtelse. Kommunerne kan ikke fordele Beløbene imellem sig uden Lagtingets Samtykke. Der maa da nu gives nogle Regler derfor. Jeg hørte, at Ordføreren sagde, at der var kommet Telegram fra Vágs Kommune om, at den vilde akceptere Ministerens Forslag. Et Telegram er imidlertid som Dokument noget klejnt. Det vilde derfor være heldigt, om Telegrammet blev suppleret med bestemte skriftlige Udtalelser fra Forstanderskabet. Og der maa ogsaa være Klarhed over, hvorledes de andre Kommuner stiller sig til Spørgsmaalet. Naar jeg har udtalt mig om dette, er det for at Udvalget kan tage under Overvejelse, at supplere det, som foreligger og skaffe Udtalelser ogsaa fra de andre Kommuner. I øvrigt vil jeg anbefale Sagen til hurtig Fremme.

R. Niclasen: Tá kommununrnar pátaka sær viðvarandi forpliktilsir, skulu kommununrnar spyrjast af, sigur Effersoe. Mann hevur spurgt Vágs kommunnu, um hon vil ganga inn á tað sum ministeriið hevur sagt. Og hon svarar ja. Men eingi er komið frá Sandiar kommunnu og Viðareiði utan tað at antlið sigur, at teir hava viljað pátikið sær hesi forpliktilsir. Frá Eiði fyriliggur eingi. Tað er neyðugt, at tingið sanktionerar tað, sum kommununrnar samtykkja, tá tað eru langvarug forpliktilsir. Men

forholdið er væl her, at man ikki nýtir at taka sakina for nær. Amtmaðurin er tó tann, sum kann approbera sakina, tá tingið ikki er saman, og amtmaðurin vil væl syrgja fyri at fáa erkleringar frá hesum kommununum, so at vanskiligheitirnar her eru fyri so vítt klárari. Eg haldi ikki, at hetta nýtir at forsinka sakina; tí amtmaðurin kann syrgja fyri, at Vágs kommuna gevur tann garanti, sum neyðugur er. Viðvíkjandi Vágar, so er har garantera 3000 kr., og har fyriliggur ordentligt dokument. Eg vil mæla til, at sakin fer til 3. viðgerðar.

O. Effersøe: Jeg tror, at der foreligger nogle Mangler. En Del af dem kan vel ordnes uden at Tinget foretager noget videre. Men efter almindelig Praksis er det rigtigt, at man ved positiv Anmoduing overdrager til Amtet at bestemme, hvad Tinget her skal fastsætte. Det vil derfor være rigtigt og egnet til at sikre Sagen, at Tinget udtaler sig i saa Henseende. Det væsentlige er, at vi ogsaa maa have Udtalelser fra Porkere Kommune og fra Sumbø Kommune. Jeg forbeholder mig at stille Ændringsforslag.

R. Niclasen: Tað er góð meining í, hvat hr. Effersøe hevir sagt, men eg trúgvi eisini, at lostandarskapini hava haft góða meining í, hvat tey hava sagt. Sakin má vera í ordan; í hvussu er trúgvi eg, at hetta lætt vil kunna ordnast. Amtmaðurin plagar í slíkum sokum at handla tingsins vegna, táið tingið ikki er saman.

J. M. Matras: Táið seinasti talari segði, at man kundi ordna hetta so lætt, hvat útreislunum viðvíkur, so undrar tað meg, at netupp hann førir tað fram, tí í Vágum hevir jú verið stórt stríð um býtan av doktaraútreisluni uppá kommununrnar; og eg haldi, at hetta má vera ordnað fyrst, so ikki sama khutur verður har suðuri, sum vit hava haft í Vágum.

R. Niclasen: Já, tað er ratt, at vit í Vágum hava haft stórt stríð av at ordna doktaraútreislurnar. Men eg havi altíð hildið ta ósemjuna verið heilt órímiliga; vit vóru samsintir í 16 ár, men so vóru 2 óeinigir við hinar 20. Men fyri tað um Vágamenn hava klandrast um hetta, og har er hrúktur partípolitikkur í hesum spurningi, so trúgvi eg, at Suðuroyingar eru, um eg so má siga, so mikið øðrvísi í politikki, at teir ikki gera tað sama. Eg trúgvi, at Vágs kommuna er soleiðis situerað, at um Sumba og Porkeri skuldu gjort vrøvl, vildi Vág við gleði betalt mestapartin av útreisluni.

O. Effersøe: Jeg ved ikke, om det just er noget Bevis paa Godhed i politisk Henseende, at ønes om, hvorledes et saadant Beløb skal fordeles; der kan let blive Kludder om det Spørgsmaal mellem Kommunerne. Dette maa klares inden Sagen bliver sendt ned. Jeg foreslaar, at Lagtinget anmoder Amtmanden om at approbere Fordelingen af Udgifterne til Lagen mellem Kommunerne.

Joen Rasmussen: Eg vil bara verja meg fyri, at vit í Seyrvági hava brúkt nakran partípolitikk í spurningunum um doktaralønir; um teir hava brúkt tað í Miðvági, veit eg ikki, men vit Seyrvingar hava ikki brúkt tað.

R. Niclasen: Eg má siga til tingmannin úr Seyrvági, at eg havi ikki fort hatta inn í sakina, men hansara síðumaður, Matras.

Joen Rasmussen: Matras nevndi ikki orðið partípolitikk.

J. M. Matras: Eg nevndi hatta bert fyri ikki at fáa vanskeligheitir aftur við hesari sak, sum vit høvdu av doktaralønini í Vágum.

Joen Rasmussen: Eg vil bert siga, at fyri okkara viðkomandi er tað ein ósonn framstilling, at vit hava brúkt partípolitikk.

D. J. Thomsen: Eg skilti Effersøe, sum hann meinti, at Vág hevir sent hetta telegram aftur til løgtingið uttan at hava spurt Sunnba og Porkeri. Eg trúgvi ikki, at tað er beint. Hvussu spurningurin er við býtingini av útreisluni til læknalønina, so eru Vágbingar ikki so smáligir, at um óeinigheit verður, vilja teir óivað taka tann størsta partin uppá seg.

O. Effersøe: Naar man forhandler om offentlige Sager, er det ikke nok at fremsætte Formodninger, Ministeriet maa forlange ren Besked. Vi bør udtale som Lagtingets Afgørelse, at Amtmanden maa være bemyndiget til at approbere, hvor meget hver Kommune skal betale.

R. Niclasen: Tað slendur jú týðiliga í lógini, at amtmaðurin skal fungera, táið tingið ikki er saman.

D. J. Thomsen: Eg havi sjálvandi einki ímóti, at amtmaðurin skal appropbera hetta.

O. Effersoe: Jeg synes Diskussionen er aldeles overflødig fra d'Herrers Side. Det centrale i Sagen er jo, at Regeringen vil kræve, at det hele skal foreligge ordnet.

M. A. Winther: Hetta spursmálið, ið hr. Effersoe hevir drigið fram, kemur ikki at liggja fyri fyrr enn staturin hevir bevilgað stuðning til læknan; tá fyrst kemur tingið at taka støðu til hetta. Fyrr enn til næsta summar kann tað ikki vera.

D. J. Thomsen: Eftir telegrammunum eru teir líka einigir nú har suðuri, sum táið teir sendu umsóknina.

O. Effersoe: Der staar jo ikke et levende Ord derom i Telegrammet. Til Hr. Winther vil jeg sige, at Staten maa forlange at vide ren Besked.

M. A. Winther: Táið tað samlaða forstandarskap stillar garanti, er tað nógmikið fyri statin; hvussu teir hýta útreishurnar millum lær sersløku kommunnur, verður ein summar spurningur, ið best kemur tingmi við og aldeilis ikki hevir interessu fyri statin.

O. Effersoe: At den Slags Forhold bør være ordnet i Forvejen følger ganske af sig selv, af god Orden. Selv om man kunde sige, at man paa en eller anden Maade kunde faa Kommunerne tvunget til at betale, saa er der her Tale om tre Kommuner, der tilsammen skal betale en vis Sum Penge; det maa paa Forhaand være afgjort, hvor meget hver skal betale.

M. A. Winther: Ja, tað er umráðandi fyri løgtingið at vita hetta í ordan, men fyri statin hevir tað einki at týða. Handa sak er komin soleiðis fyri, at tað vildi verið beinast at ordna hetta í ár, og eg vil henstilla til hr. Effersoe at framseta sítt uppskot um, at amtmaðurin bemyndugast til at approbera býtið av útreishurnar millum kommunurnar, so noyðast tær at fáa hetta avgjort nú. Tað formella má vera í ordan, og tað tekur jú enga tíð at fáa hetta fastsett.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Hov sum serstok kommuna.

2. viðgerð.

Orðføraríð (S. P. úr Konoy) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at samtykkja uppskot nevndarinnar.

O. Effersoe: Jeg skal anbefale Udvalgets Forslag. Det fremgaar fornemtlig deraf, at det er den Stilling, som Forstanderskabet tidligere har indtaget, som bragte Sagen til Standsning. Jeg vil nu haabe, at det lykkes at fremme den efter at denne Misforstaaelse er klaret. Jeg finder i denne Forbindelse Anledning til at fremhæve, at hele dette Spørgsmaal om at sætte Grænsen syd for Hovsá er ganske ubegrundet, og jeg kan ikke tænke mig, at der i en overskuelig Fremtid vil blive iværksat nogen Bebyggelse Syd for Aen; navnlig kan jeg ikke tænke mig, at Haugeejerne vilde gaa ind derpaa. Der er jo Plads nok paa den sollyse Side, saa Folk kan bosætte sig der.

D. J. Thomsen: Tað gleðir meg, at eg saman við tingmanninum av Tvøroyri Edward Mortensen havi verið við til at taka hesa sak uppaftur; tað sá jú út, sum hon var stedgað við alla og mestsum burturdeyð. Á Hovbinganna vegna vil eg takka útvalginum og nevna til at stemma fyri uppskotinum. Eg talaði við 1. viðgerð nakað um henda spurning og tað gleðir meg, at tað, eg har segði, nú er blivið bekreftað. Hovbingar og Forkuningar hava ongatíð verið óeinigir um markið.

Formaðurin: Jeg maa gøre opmærksom paa, at Andragerne selv har skrevet det modsatte, og at det er dette, som har bragt Sagen ind i det skæve Spor, som den nu forhaabentlig er ved at komme ud af.

O. Effersoe: Formandens Udtalelse fastslaar tydeligt nok, hvorledes Sammenhængen er. Jeg skrev straks til Hove for at faa Rede paa, hvorledes det forholdt sig; hvis det bekræftede sig, hvad jeg formodede, at det hele beroede paa Mangel paa Overvejelse, var det jo naturligt, at Sagen blev bragt frem paa Tinge igen. Men jeg vilde ikke gøre det, før jeg var klar over, hvorledes Sagen forholdt sig

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Sandvík sum serstøk sókn.

2. viðgerð.

Orðføraríð (S. P. úr Konoy) greiddi frá nevndaráliti sum.

O. Effersøe: Selve Spørgsmaalet om, hvor Markskellet skal være kan nok ses paa forskellig Maade, men jeg har i og for sig intet imod den Stilling, Udvalget har taget. Der kan maaske tænkes at komme nogle Huse sønden for Skellet, men de kommer saa til at høre til Samlingen. Jeg vil ikke have Sagen forsinket af den Grund.

Hvad det andet Spørgsmaal angaar, har Udvalget taget en bestemt Stilling imod Forstanderskabet. Jeg skal ikke modsætte mig Udvalgets Forslag, men blot paapege, at dette Forhold ikke kan sammenlignes med Fordelingen af Skatten paa Jordegods i Almindelighed.

J. H. Poulsen: Hendan sak er ikki so vorðin sum hin fyrra. Sandvík er síðuorðnað við Skopun, tí Sandvík er útflytubygd frá Hvalba. Teir mugu fáa loyvi at leggja so nógv inn í Sandvík, sum teir kunnu dyrka upp. Soleiðis varð gjort í Skopun. Hettar er ikki ein útskiljing av herligheitum. Um døglingar koma, vørða Hvalbingar við at behalda teir. Her er bert talan um kommunala útskiljing. Eg kundi neguligt hava hug at stilla broytingaruppskot.

Th. M. Strøm: Eg skal upplýsa nakað í hesi sak, sum er eitt sindur líkt sakini um útskiljing av Hovi og Porkeri. Forstandarskapið er samsint um at brúka ánna sum rennur ongan í dalin sum mark. Har eru tráðir innlagdar og ætlanin er at innleggja fleiri. Og tað er sannsýnligheit fyri, at tað eisini koma hús, og tá mugu tey eisini koma at hava samband við Sandvík, havn skúlar og vegir og havn útróður saman við Sandvík, alt meðan hvort plássið hoyrir til sína sókn. Tí má hesin spurningurin gjølla umhugsast. Tað lykist mær meiri natúrligt, at markið verður sett eftir eggini.

O. Effersøe: Jeg er bange for, at Strøms Standpunkt vil komme til at lægge Sagen Hindringer i Vejen. De Personer, som ejer de to Havger, som ligger Syd for Elven, vil komme til at svare Jordskat til Sandvigs Sogns Kommune. Og de, som besidder Jord i Sandvig og bor i Kvalba, kommer ogsaa til at betale Skat til Sandvig. Saaledes vil f. Eks. Giljumbonden, som bor i Hvalbø, komme til at betale Skat til Sandvig. Maaske Hvalbinger af den Grund vil blive saa misfornøjede, at de ikke vil gaa med til Udskillelsen. Fra Sandvig er der stærk Trang til at Bygden kan blive særskilt Kommune. Man maa derfor se til at faa Sagen ordnet. Om det kommer til at blive Tilfældet, at man faar Bebyggelse Syd for Elven, saa maatte man senere love om paa det hele.

S. P. úr Konoy: Eg vil siga, at forstandaraskapið har suðuri hevur haft tíð til at hugsa seg um. Vit skrivaðu greitt í nevndaráliti ífjør, at vit meinto, at fjallaryggurin var høskandi til mark, og vit søgdu at Sandvíkar sóknar kommunu kundi eiga hesa hagapartar. Síðani bóðu vit teir um at geva okkum uppskot um eitt bestemt mark. Og teir fyrislógu Hovsá til mark. Men teir hava hugsað minni um geografiinum enn um hvørjir sum eiga hagarnar. Eg má innrømma, at mær hevði dámt betur, at teir hevdu valgt tað mark, sum vit vildu. Vit mugu geva tað galdandi, at tað sum er ein geografisk heild, skal hoyra til sonn kommunu. Teir hava ikki fylgt okkara ráðum, og so mugu teir taka fylgjurnar. Men fyri separatistiskum tendensum har suðuri vilja vit ikki boyggja okkum.

R. Niclasen: Sandvík vil skilja seg frá Hvalba og verða serlig sókn. Forstandarskapið er samsinnt um at skilja sundir og er eisini samsinnt um markuaskjalið. Tá teir vilja hava ánna til mark, so haldi eg, at teir skulu fáa loyvi til tað. Men tað er ikki at ivast í, at um korta tíð vilja teir koma at byggja á eystari síðuni á ánni; og hesir koma tá at hoyra til Hvalbiar, og at svara skatt hagar. Tað er ónatúrligt, at Sandvíkingar soleiðis skulu koma at skatta til Hvalbiar. Hitt einasta rætta markið er fjallaryggurin millem Sandvík og Hvalbiar. Tað er tingið, sum ræður í hesum viðurskifti.

Th. M. Strøm: Tað má ikki uppfatast soleiðis, at eg vil forða fyri at hendan sakin far frama. Men tráðir eru innlagdar sunnanfyri ánna og so koma vist hús har eisini. Og um hús koma at vørða har, so mugu tey brúka skúla saman við Sandvík. R. Niclasen er farin eitt sindur skeivur, tá hann sigir, at áin rennur gjøgnum ein hagapart. Hon rennur gjøgnum tveir hagapartar.

R. Nielsen: So havi eg heilt misfatað, hvat ið markið skuldi vera. Eg havi altíð trúð, at áin rann mitt ígjøgnum hagan, so ein partur fell til Sandvíkar og ein til Hvalbiar. Eg skal tí vera við til at framseta broytingaruppskot um at fjallryggurin skal vera markið.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Havnar kirkjugarður.

2. viðgerð.

Oddsmaðurin (Prósturin) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at samtykkja uppskot nevndarinnar.

H. C. W. Tórgarð: Eg havi stillað endringsforslag. Tá sakin var fyri síðst viðtók tingið at betala tað neyðuga beløpið. Tað var ein viðtøka, sum orð fyrsarin nevndi var yvireinsstemmandi við tann praksis, sum tingið hevur. Nevndin hevur ikki funnið, nær maður hevur bogynt hendan praksis. Á spurningin um Havnar kommuna vil láta ta jørð, sum skal til kirkjugarðin, hevur Havnar kommuna svara nei. Tá millumtinganevndin ikki hevur framt hetta, so skyldast tað, at maður helt at ifylgi kongliga resolutión 1833 skuldi kirkjukassin ikki betala hetta. Men tingið hevur skapt tann praksis, at kirkjukassin skal betala. Mær finnur eingi annað, enn at tingið skal betala av kirkjukassanum. Her ræður tað um nokk so stóran pening. Men tað er ikki ein kirkjugarður, men onnur ting, sum kirkjukassin skal betala fyri. Eg havi sett fram eitt broytingaruppskot, tí at eg ikki havi kunnað gingið við til at tingið nú letur annleggja ein kirkjugarð, soleiðis at kommunan seinni kundi bliva tilpliktað at betala alt hetta. Býráðið má fáa tíð til at umrøða seg viðvíkjandi, hvussu tað kann skaffast kirkjugarður. Eg vil mæli til, at hetta uppskotið verður samtykt.

A. Samuelsen: Eg havi ikki granskað tey uppskot, sum eru komin frá nevndini. Eg vil spyrja, hvussu maður skal bera seg at fyri at fáa hesa dómsavgerð. Er tað meiningin, at umsitmaðurin skal annleggja sak móti Havnar kommunu. Eg haldi, at mann kundi hava funnið ein annan máta enn at fara til sak. Kundi mann ikki hava stillað spursmálið til ministaran. Mann kundi fingið ílag við Havnar kommunu, at mann fekk tað ordnað við eini avgerð frá justitsministeriinum. Eg haldi, at spursmál sum hesi egna seg illa at fara til rættin við. Tað kann ikki bera til, at mann ikki kann fáa nakað burtur úr við forhandling. Eg forstandi ikki, at forhandlingar um hetta í nevndini skuldu vera koyrdir soleiðis fastir. Tað er illa, um hetta málið fyrst skal til forlíkilsiskommissión, sorinskrivaran og so appellerast til høgsta-rætt. Eg kann ikki stemma fyri hesum mátanum.

Prósturin: Eg kann halda við A. Samuelsen, at tað er óheldugt, at hetta skal liggja soleiðis fyri, at mann skal ganga hendan vegin. Men hor er forhandlað við Havnar kommunu. Havnar kommuna er spurd, um hon vil lata jørð til kirkjugarðin. Men hon vil ikki tað. Men jørðin skal skaffast til kirkjugarðin. Tí hava vit viljað fingið eina avgerð. Vit hava skotið sakina til umsitmannin, og fer hann at gera við hendan spurningin.

Formaðurin: Hvis man straks bosluttar, at der skal Kirkegaarden ligge, saa kan Kommunen sige, at det er os, som skal bestemme. Det vilde være heldigt, om man til 3. Behandling kunde drøfte Sagen og eventuelt fremkomme med Ændringsforslag. Det kan ikke nytte at begynde med det samme med Udvidelse af Kirkegaarden og saa bag efter anlægge Sag.

A. Samuelsen: Eg vildi, at nevndin kom við einum lógaruppskoti, sum leggur á kommununa at láta grund til kirkjugarðin. Tað er ivaleyst líka so skjótt fyri at fáa tað gjognumfort. Lóggevingsmaktin hevur loyvi at siga, hvussu tað skal ganga til við kirkjugørðum. Her er betur at hogga beinan vegin ígjognum og at ministarin sigir: soleiðis skal tað vera verðið við kirkjugørdum í Føroyum. Vit kunnu ikki vera bekentir at trutast av leingi um hesa sakina.

Prósturin: Eg vil til formannin siga, at vit hava jú í okkara uppskoti ikki viljað tikið alt við sum neyðugt er, men bert tað sum neyðugt er í neyðstilfeldi, soleiðis, at Havnar kommuna stendur um eitt ella tvey ár líka frítt sum nú. Eg haldi tí ikki at hetta mátti kunna forða sakini.

N. Debes: Eg var eisini í millumtinganevndini, sum hevur við hetta mál at gera. Eg fekk tað inntrykk, at tað var

neyðugt, at hendan ávísdkan kom at ganga fyri seg nakað skjótt. Men tíðin er liðin og einki er gjørt, og eg dugi ikki børi at siggja onn at long tíð má koma at ganga onn. Uppskotið frá nevndini er eitt sindur hoteinkiligt, tí her er eitt keðiligt forhold fyri Havnar kommunu. Tí um hon kom at skuha annleggja ein kirkjugarð, so kundi tað teinkjast, at hon eigur arealir, sum hygionisk sæð liggja betur fyri onn hesi. Ein kirkjugarður eigir at vera so, at hann liggur væl hygieniskt sað. Tí ori eg nakað beteinkiligir við uppskotið hjá nevndini.

Prósturin: Eg haldi ikki, at okkara uppskot forðar kommununi at leggja kirkjugarðin har sum teir sjálvir vilja, tí hendan vídkan, sum her er talan um, er einans ein neyðhjálp. Havnar kommuna vil í tann máta koma at standa fritt, sjálvt um eitt stykki nu verður lagt aftrat kirkjugarðinum.

S. P. úr Konoy: Tað vil hava sín týdning at vita, um kirkju kassin ella kommunan hevur forpliktilsir fyri kirkjugarðinum. Tað er beinast at lata dóm falla í hesum máli. Vísir tað seg so, at dómurin sigir, at hetta ikki er kirkjuplikt, so verður løgtingið noytt at framseta lóguppskot um hetta verður gjørt til kommunala plikt. Teir menn, ið eru kunnugir úti á Svínaryggi, siga, at teir standa yvirfyri tí, at teir skjótt ikki kunnu grava fleiri niður har úti, og vit kunnu ikki forsvara, at vit her í høvuðstaðnum skulu koma at standa yvirfyri hesum. Tað er eisini nóg so nógv fyri at hugsa um, at vit skulu noyðast at grava tey upp aftur, ið hava ligið í jørðini í bert 20 ár, tað átti kortini ikki at vera tað samma slektarlið, sum gravar tey deyðu uppaftur.

J. Patursson: Menn eru ikki á einum máli um, hvør ið eigur at gera kirkjugarðarnar. Eg veit ikki, um norska lóg kann siga okkum nakað um tað: har stendur nógv um kirkjuviðurskifti. Men um man ikki hevir annað at ganga eftir, so kann tað ofta vera gott at kanna eftir, hvat ið hevir verið siður, tí siður er ofta lóg. Har, og eri frá, í sóknunum her heiman fyri, eru í núnari tíð gjørdir tveir kirkjugarðar, og fólkið har hevir sjálvt gjort teir: eingin hevir hugsað um kirkjukassan.

A. Samuelsen: Eg vil ikki gjarna forleingja diskussiónina. Hr. Konoy meinti, at tað var ikki ratt at ganga tann veg, og fyrislóg, at gera eina lóg, og hann segði, at man var ikki vitandi, um hetta var ein kirkjulig plikt ella ein kommunal. Men neyðugt tí hetta er ivingasamt, og við tað at tað ikki sýnist sum oll pláss hava brúkt sama sið, vil tað vera ringt at fáa nin dóm, ið vil hóska fyri allar sóknir, og tað er jú ein slíkan dóm, kirkjukassarnir ynskja. Tað kann jú vera, at siður hevir verið í Havn, at kirkjukassarnir hava borið útreislurnar, og tað kann vera, at rotturin vil gera tað av eftir hesum siði. Men løggávumaktin stendur frítt, hon kann leggja igjognum alt tað ivingasama. Eftir hvat tingmaðurin úr Kirkjubø sigir frá, hava teir í hansara sókn ein heilt annan sið enn aðra staðni, um tað nú verður avgjørt eftir hasum, fáa vit kannska fleiri sakir. Konoy helt tað vera pietetsleyst at grava um eftir bert 20 árum, tað haldi eg eisini, men eg haldi sautíðis, at tað er eitt sindur pietetsleyst at fara til dómstólarnar fyri at fáa avgjørt, hvør ið skal begrava okkara deyðu. Eg eri samsintur við Konoy í, at um hetta hevir verið kirkjulig plikt, so gongur hetta meiri og meiri yvir til at vera ein kommunal plikt. Kommunan hýsir ollum, kirkjan rúmar so við og við ikki ollum í samfundinum. Eg meini tað var best, um vit ordnaðu hetta við lóg, at kommununar skulu administrera kirkjugarðarnar.

N. Debess: Ja, soleiðis haldi eg eisini, at kommunur eiga at taka hesa plikt uppá seg. — Táið hetta uppskot er komið frá nevndini, so er tað at avhjálpa eina neyð, ið er nú fyri hond. Har eru triggir ámarar av tí stykki, ið skal brúkast til kirkjugarðin í Havn, og tað er ringt at fáa teir at einast um avstandilsi. Táið nú bert nýtist eitt lítið petti fyri fyrst, sum her er fyrisligið, so verður tað væl bert av jørðini hjá einum manni, og so verður tað væl uppaftur meira torfort at fáa hutta lítla stykki. Eg meini, at sjálvt um útreislur til kirkjugarðar skuldu verið kommunalar útreishtir í framtíðini, so eigir í hvussu er tað lítla stykki, ið nú skal takast aftrat at betalast av kirkjukassanum, tað verður væl bert einar 1000 kr. Og og haldi, at kommunan ikki skal betala hetta aftur, so henda útreisla kemur at hoyra fortíðini til.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Brævur frá verkfrøðingi Wedén.

2. viðgerð.

J. Patursson: Tað mál, ið er umrøtt í hesum brævi, var fyri á tingi ífjor; tá skildist tingið í ein meiriluta og ein minniluta hesum viðvíkjandi. Síðani hevir sakin verið niðursoud, men hon stoðgaði í fíggjarnevndini, ið seinni ymsar treytir fyri at fremja verkið, nevniliga at aunaðhvørt allar kommunurnar garanteraðu at allar tær 3600 h. k., sum verkið er ætlað at geva, skulu verða nýttar, ella at hetta verður garanterað av privatum abonnentum. Nú hevir hr. verkfrøðingur Wedén verið í Føroyum, og hann hevir sent tinginum eitt brævur hesum viðvíkjandi. Tað var víst í eina nevnd, og henda nevnd var ikki samsint um, hvussu brævið skuldi skiljast á beinan hátt, sigliga um tað kravdist, at tingið skuldi átaka sær nakran peningaligan garanti ella ikki. Sumir í nevndini hildu, at hetta var neiðlanir, sumir hildu tað ikki. Vit tingu so í nevndini fund við hrr. Wedén, og hann greiddi frá, at løgtingið ikki varð biðið um at átaka sær nakra peningaliga ábyrgsla, men at løgtingið varð biðið um at úttala, at tað var eitt sterkt ynski um at fáa eitt slíkt verk her í Føroyum, at allar h. k. vildu verða nýttar, og at teir ynsktu, at løgtingið vildu átaka sær at útbýta elektricitetsnøgdina. Prísurin fyri elektricitet skuldi so ásetast av løgtingi, soleiðis at inntøkurnar skuldu nýtast til hesar útreiðslur:

1. rentur og amortisatión av øllum útreiðslum til uppbygginga verksins.
2. avløga til viðlíkahalds og óvantaðar útreiðslur.
3. administratión.

Løgtingið skal eisini ráða fyri hvussu nikið verður avlagt árliga til punkt 2.
Vit samdust so í nevndini um at taka við hetta sjaldsama góða tilboð, ið er so stórt, at løgtingið aldri hevir fingið slíkt tilboð áður. Nú kann tað vera vandasamt at siga, hvussu nógv hvør hestakraft fer at kosta, tí soleingi sum ikki er bygt og leidningurin ikki er lagdur, kann ongin jú ikki á eina krónu siga, hvat tað vil kosta. Men útrokningar eru tó gjordar so nikið, at tað kann ætlast at kraftin til kommunur fer at kosta meir enn 150 kr. hvør h. k. í hvussu er. Málið liggur nú so vel fyri, at eg tori vóna og vil ynskja, at løgtingið ger eina slíka samtykt, so at hin danska fíggjarnevndin við góðum treysti vil siga: Vit tíbráða at stilla eina stats-ábyrgslu uppá 2 mill. kr. Tað er tí gleðiligt, at meiriluti og minniluti eru samdir í hesum máli.

Eg skal loyva mær at lesa uppskotið upp.

O. Effersøe: Jeg er i Forslaget enig med Udvalget, men har i Motiveringen ønsket at indføre en særlig Bemærkning. Jeg skal dog ikke komme udførligt ind paa den. Det nuværende Mindretal har som Mindretal i 1918 og som Lagting ved tidligere Lejligheder bestrebt sig for at tage sig sagligt af denne Sag og give den et saadant Indhold, at der skulde være Betingelser for at faa noget godt og gavnligt ud af den. Bl. a. har vi altid lagt stor Vægt paa at holde alt usundt og Sagen uvedkommende fjernet og særlig har det været os magtpaaliggende, at Lagtinget ikke paatog sig nogen økonomisk Garanti, som det vilde være urigtigt at paalægge Amtskommunen og heller ikke paadrog sig nogen moralsk Forpligtelse, som Tinget ikke kunde forsvare. Vi er selvfølgelig klar over, at Vandkraften i Fossá og Sørvaagsvatn repræsenterer betydelige Værdier, som kan udnyttes til Gavn for visse Dele af Øerne, men for hvor store Dele af Øerne kan vi aldeles ikke udtale os om. I hvor stort Omfang Kraften vil komme Øerne til Gode afhænger meget af, hvor bekosteligt det vil blive at bringe den ud paa længere Afstande. Det kan vi ikke have nogen Mening om i Lagtinget. Da Sagen i Begyndelsen af Tingsamlingen forelaa for os ved Skrivelse fra Ingeniør Wedén, saaledes at Amtskommunen skulde overtage en overordentlig stor økonomisk Garanti, satte vi os kraftigt herimod, idet vi mente, at Lagtinget absolut ikke kunde indgaa herpaa. Senere fik vi saa den Besked fra Hr. Wedén, at der ikke var tilsigtet nogen økonomisk Garanti; at dette heller ikke var Tilfældet efter den anden Skrivelse, var vi da ogsaa klar over, men det var det derimod efter den første Skrivelse. Enhver kan jo sætte sig ind i de to Skrivelser, der foreligger trykte. Efter at have modtaget den fornyede Skrivelse fra Wedén, var Mindretallet klart over, at man heller ikke kunde gaa ind paa den moralske Garanti, her krævedes. Jeg skal tillade mig at oplæse et Stykke af den. »Opfattelsen skal forstaas derhen, at Tinkon er den, at Føro Amts Kommune udtaler som sin Overbevisning, at Trangen til elektrisk Kraft for derigennem at opnaa Lys og Varme til Husholdningsbrug er saa stor, at Kraften 3600 HK. efterhaanden vil blive udnyttede. Dette har vi ikke villet udtale os om uden

Forbehold, men krævede, at der sikredes Forbrugerne, at de ikke kom til at betale mere end rimeligt og forsvarligt var, saaledes, at Prisen pr. HK. ikke sattes højere end til Dækning af Anlæg og Driftsomkostninger. Herom har Udvalget Ret til at skønne og eventuelt nedsætte Priserne; den anden Part maa saa enten finde sig deri eller indanke Spørgsmaalet for Domstolene. Men det maa under ingen Omstændigheder forstaas saaledes, at vi skulde have udtalt os om, at der vil kunne leveres saa megen eller saa billig Kraft, at man paa sine Steder helt kan holde op med at bruge Tørv eller Petroleum. Dette Spørgsmaal maa staa hen, derom ved vi intet. Fremtiden maa afgøre, om her er noget »Storværk« sket. Naar Patursson siger, at der var sket et Storværk, saa maa Fremtiden afgøre, hvad der kommer ud af denne Sag. Vi i vort Parti kan ikke have stillet os mere imødekommende; men om det er tilstrækkeligt for Statens Myndigheder, ved jeg ikke. Om vi igennem det, som sker nu, vil kunne sikre Befolkningen tilstrækkelig billig Elektricitet, det ved jeg heller ikke. Jeg tror, at dette Anlæg vil blive betydelig dyrere end det, man regner med. Dette vil jeg understrege. — Der er et Onraade, som jeg har en vis Forstand paa og maaske bedre Forstand paa end de, som er optraadte som sagkyndige. Det er angaaende Arbejdsvilkaarene og Arbejdslønnen her paa Øerne. Disse vil afhænge af, hvorledes Fiskeriet bliver i de Aar, da dette Værk skal sættes i Gang. Vedrørende Kuldriften i Kvalbø viste det sig, at det næsten ikke var muligt at skaffe Arbejdskraft, og de Arbejdere, man fik, var meget kostbare. Men alt dette maa overlades til Selskabet. Det, som har været Hovedopgaven for Mindretallet er ikke at lægge Hindringer i Vejen for at bringe mest muligt ud af Vandkraften i Fossaa og Sørvaagsvand. Et andet er, at vi ikke ved vore Udtalelser har paataget os noget Ansvar for, hvis Statens Garanti bliver 2 Mill. Kr., at der da kan siges til os, at det skete i Henhold til Æders (vore) uheldige Raad. Men det skal ikke kunne siges senere. Naar dette bliver vedtaget, har Tinget gjort, hvad Tinget kan gøre for denne Sag. — Man har talt om, at denne Elektricitetssag skal fremmes for offentlig Regning. Det har Mindretallet følt sig mest tiltalt af. Men da Sagen nu ikke kan fremmes som offentligt Foretagende, saa har vi villet støtte den. — Der kan spørges: Hvis Sagen bliver fremmet paa denne Maade, vil det saa have til Følge, at Kommuner og andre, som maatte have Lyst at faa elektriske Anlæg i Stand, skal blive hindrede deri? Det mener jeg ikke, for saavidt de kan levere Elektricitet mindst ligesaa billig som dette Selskab. Det næste Spørgsmaal er: Naar Staten engagerer sig for dette Anlæg, saa vil det maaske blive vanskeligt for den at engagere sig for flere andre Anlæg. Men Staten maa erkende, at som vi har villet støtte dette Anlæg, saaledes vil vi ogsaa støtte Anlæg, som kan afhjælpe Trangen paa andre Steder af Øerne.

J. Patursson: Vit eru jú eintir í uppskotinum til tingið og um annað ymiskt kann vera, sum vit ikki eru eintir um, so hevur tað ikki so nógv uppá sog. Effersoe sigir, at tá hetta mál kom á ting í sumar, lá tað so fyri, at tingið skuldi bera ein overordentlig stor økonomisk garantie, og at tað var hann, sum hevði gjort tað, at vit ikki kunnu at bera ein slíkan garanti. Men tað er ikki so; tí vit (hinir) í nevndini hava altíð sæð hetta málið soleiðis, sum at tingið aldri skuldi geva seg inn undir nakra pengaliga ábyrgsli. Tað einasta tingið skal gera, er at útbýta hesar 3,600 rossastyrkir. Annars hevur tað nógv at siga, hvør ið skal hava artuna av at ondin á hesi sak mú er so góður. Síðani sigir Effersoe, at hann hevur gjørt tað, at hvør rossastyrkin kemur at kosta so lítið. Heldur ikki hetta er rætt, tí hettar er eftir uppskoti frá Wedén, verkfrøðingimum. Tað siget her, at kraftin skal kosta eftir tí, sum verkið kostar at byggja og driva. Hvørki minni- ella meginhuturin í nevndini hevur æru av hesum. So sigir Effersoe eitt. sum nakað hevur at týða: Um hetta, sum tingið nú ger, er nóg mikið fyri, at tann danska figgjarnevndin samtykkir tað. Tað veit Effersoe ikki, sigir hann. Eg veit tað heldur ikki. Tó haldi eg tað vera ivaleyst at um báðir umboðsmenn, sum Føroyingar hevn har niðri, eru samsintir, so gangur bæði ministarin, figgjarnevndin og ríksdagurin við til stilla tann garanti, sum her krevst. Og eg kann ikki hugsa mær annað, enn at báðir ríksdagsmenninir vilja leggja dent á, at hetta, sum tingið hevur avgjort, skal fara til, at felagið fær tann pening, sum tað hevur brúk fyri í formi av garanti frá figgjarnevndini. Tá vil tað ganga.

O. Effersøe: Jeg glemte at sige, at Mindretallet ikke har været enig med Hensyn til en Henvendelse, som er udgaaet fra Udvalget til Kommunerne. Ellers er jeg nok enig med Ordføreren deri, at Spørgsmaalet om de første Breve fra Wedén

ikke er af Betydning for selve Sagen. Det er rigtigt, at notere sig, at Skrivelsen fra Wedén omfatte, at Folketingets Finansudvalg har stillet som Betingelse, at samtlige Kommuner stiller Garanti for, at den Kraft, som er til Disposition, udnyttes. I Skrivelsen fra Hr. Ingeniør Wedén ser man, hvad det er, Finansudvalget kræver, efter Hr. Wedéns Forklaring. De vil have en Garanti for, at Kraften udnyttes. Naar det nu i Skrivelsen til Lagtinget siges, vi har ikke kunnet opnaa denne Garanti, vi er i Knibe — ja, det siges ikke med rene Ord, men det er jo Meningen —, saa maa det vel være Hensigten, at Lagtinget skal overtage denne Garanti. Man maa tro, at naar vi skal overtage Elektricitæten til Fordeling, saa er vi bundne til at betale den med. Der er forespurgt hos Kommunerne, om de vil overtage Garantien, men de ønsker ikke at tage den; der er forespurgt hos private, de ønsker heller ikke at tage den, ja, saa vilde Lagtinget være nødt til at overtage den, om man havde underskrevet Skrivelsen. Hvis man opfatter Skrivelsen som Hr. Patursson, og man skriver under ud fra den Forudsætning, saa kan det ikke hjælpe, om man senere kommer og vil sige, at man har misforstaaet Skrivelsens Indhold. Har man først skrevet under en Skrivelse, kan det ikke nytte, om man senere kommer og siger, at man havde rigtig nok aldrig tænkt sig, at det og det laa i Skrivelsen. Naar Hr. Patursson siger, at han har ikke talt med Hr. Wedén, saa passer det vist ikke. Jeg har talt med ham i et Møde her i Lagtinget, og Hr. Wedén gjorde ikke nogen Indvending mod min Udlægning af Skrivelsen, da jeg spurgte ham, om den ikke var saadan at forstaa. Jeg maa fastholde, at i vort Forslag er indført mere betryggende Bestemmelser end i Hr. Wedéns Forslag.

J. Patursson: Effersøe hevir nakað misfatað meg, tá hann sigir meg hava sagt, at eg ikki havi talað við hrr. Wodén. Eg havi talað nógv við hrr. Wodén, men ikki um hetta brøv; hevði eg sæð hann framman undan hann sendi hetta brøv, vildi eg sagt, at hann skuldi ikki hava skrivað á henda máta, tí hatta kann misfatast. Eg tori at siga fyri okkum 3 í nevndini, at vit høvdu aldri gingið við til at garantera verkið í Vestmanna við peningi. Táið hrr. Effersøe sigir, at tað er spurt hjá kommununum, um tær vilja garantera, og tær siga nei, at tað er spurt hjá privatum, og teir siga nei, ja, so meini eg eisini, at løgtingið mátti siga nei til at garantera, tí løgtingið er peningaliga fast knýtt til kommununar. Kann løgtingið finna ein máta, ið figgjarnevndin heldur vera góðan, so verður kannska nakað burtur úr sakini. Vit hava altíð verið klárir yvir, at løgtingið ikki vildi átaka sær peningaliga garanti.

O. Effersøe: Jeg maa sige, at Hr. Patursson og hans Partifæller var klare til at sluge Forslaget som det var, og først da vi gjorde opmærksom paa Vanskelighederne kom Sagen i en anden Gænge.

J. Patursson: Tað passar ikki, sum Effersøe sigir. Vit vóru klárir til at taka við uppskotið uttan at taka nakran peningagaranti.

O. Effersøe: D'Herrer var straks klar over og udtalte, at det var et udmærket Forslag, der forelaa, selvfølgelig ud fra deres Forudsætning, og de var rede til at skrive under. Jeg har aldrig betvivlet, at Hr. Patursons Opfattelse altid har været den, han har gjort gældende, men det vilde være uklogt og i høj Grad uforsigtigt at skrive under Hr. Wedéns Skrivelse.

J. Patursson: Effersøe talar um, at vit skuldu vilja skriva undir. Nei, tað hava vit aldri hugsað um; vit vildu framseta eitt nýtt uppskot, soleiðis sum vit hava gjørt, og tað vildu vit undirskriva.

O. Effersøe: D'Herrer var meget glade over Hr. Wedéns Forslag og var klar til at anbefale det til Lagtingets Vedtagelse. Da man saa fra vor Side gjorde opmærksom paa Vanskelighederne, forandrede de deres Opfattelse. Hvis d'Herrers Opfattelse var blevet Grundlag for Udvalgsbehandlingen, vilde Affattelsen af Udvalgsbetænkningen uden Tvivl være blevet, at det foreliggende Forslag anbefaledes til Vedtagelse, og det kunde blive skæbnesvangert, om vor Opfattelse er rigtig.

J. Patursson: Hrr. Wedén hevir jú sjálvur sagt, at hann ongantíð hevir haft hatta í huga.

O. Effersøe: Det er ganske ligegyldigt, hvad Hr. Wedén bag efter kommer og siger, at han har ment, men man kan kun tage Hensyn til, hvad man kan faa ud af selve Skrivelsen.

J. Patursson: Tað hevir víst sæg, at okkara uppfatan er komin fram í nevndarálitinum, meðan hrr. Effersøes er fokin.

A. Samuelsen: Vit høvdu sakina hor á tingi í 1907 og vit vóru nakrir tá, ið vildu úttala nakað um sakina; tíverri er einki komið burtur úr henni. Táið og hvørki kann fylgja fleirtalinum ella minnitalinum, so kann eingin siga, at tað or, tí eg ikki vil styðja sakina, tí og havi viljað styðja hana, tað fyrsta hon kom fram. Men nú fyriliggur hon í einum heilt øðrum skili. Eg havi roynt at fáa upplýsingar um hetta felagið, ið skal fáa elektricitetsverkið í lag. Fyrst var tað p/f. Føroya handil og industri; tað tykist ikki at vera uppi í longur, men nú er tað eitt fossafelag. Eg havi ikki kunnað fingið klárheit yvir hetta felag; tað einasta eg have fingið fatur á eru 3 nevndarlimir í Keypmannahavn. Lógir eru ikki at finna, aktiukapital veit eg ongan um, men eg gangi út frá, at tað má vera eitt aktiuselskap. Tað fyrikemur mær eitt sindur vandafullt at lata tær bestu kraftkeldur í Føroyum, Fossá og Seyrvágsvatn, til eitt aktiuselskap, ið kann selja síner aktiur til hvønn sum helst. Vit vita einki um ikki aktiukapitalurin er týskur ella franskur, vit vita ikki hvar aktiurnar kunnu seljast, um tær verða á donskum hondum ella ikki. Eg havi í Keypmannahavn fingið uppgivið, at departementschef Andersen, Wedén og Petur á Heygum, sonur Olavs á Heygum, eru bestýrilsi, og tað er alt, eg havi kunnað fingið at vita um felagið. Hvussu kann løgtingið innláta seg við hetta felag, ið vit einki vita um, um Fossá, ið vit halda vera so verdífulla, og um Seyrvágsvatn, ið vit halda vera so verdífullt. Eg haldi, tað fyrsta, vit áttu at gera, var at sikra, at aktiukapitalurin er á donskum hondum — eg haldi, helst á føroyskum hondum. Eg skal ikki koma inn uppá tær forhandlingar, sum fordar eru við ein bestýrilsislim í partafelaginum; hansara framstillingar mugu síggjast í heilhold til tað gamla orðið um, at hvør sigur sína sogu sum besta. Her, hvar tað dreyar seg um at fáa statin at garantera 2 milliónir fyri selskapið, er tað rímiligt, at ein bestýrilsislimur ger sær ónak fyri at fáa løgtingið til at anbefala tað. Men kann venda sakina, sum nan vil, men eg fái einki annað úr tí heila enn tað, at skal útvalgsins forslag forstandast, so at tað or nøkur meining í tí, so má tað forstandast á tann hátt, at tað vil styðja hetta selskapið. Og tað haldi eg ikki løgtingið skuldi innláti seg uppá. Hvussu er gevur tað hesum fossaselskapinum, sum vit aldeilis ikki vita, hvat ið er, sonikið officielt prógv, at bestýrilsismenninir har meina at klára seg við tí. Tað einasta skuldi verið, at ordførarin fyri fossanevndini við sínum úttalilsinn íáðni hevur greitt okkum so týðiliga frá, hvat løgtingið meinar, at vit uppá hansara orð kunnu siga: Nøkur *anbefaling* skal hetta ikki vera í hvussu er. Hann bedýraði jú úttrykkiliga, at her ikki var talan um at garantera nakran pening, ikki á nakran hátt — hann sýntist mestsum fornermaður, at nakar skuldi misteinkja útvalgið fyri tað. Men tá løgtingið ikki kann teinkja nakra garanti, so er selskapið ikki nógv vert. Tá løgtingið, sum tó skuldi vera mest interesserað og kount sakina best, ikki torir at stilla nakra garanti, ja so er tað naturligt, um finansútvalgið sigur: So tora vit heldur ikkil Tí soleiðis úttalaði tingmaðurin úr Kirkjubo seg og Rasmus Niclasen seg eisini. Tá løgtingið endiliga skal upptreda her, so er tað tó lættari hjá tí at garantera við pongum enn at pátaka sær eina moralska garanti, sum kannska kann forvalda at nakað gongur skeivt, sum annars ikki var komið ílag. Viss løgtingið anbefalar hesa fyritøku, sum tað ikki vil ofra eitt oyra uppá, so vil tað siga tað sama sum at honda fyritøka ikki er stórt verd. Hertil kann kannska onkur siga, at løgtingið jú ongar pongar eigur, men tað ber ikki til, tí hetta liggur okkum nakað nógv nærri enn aðrar fyritøkur, sum løgtingið hevur sett seg í stóra skuld fyri. Annars forundrar tað meg aldeilis ikki, at tingmenn hava nakran útta fyri at garantera fyri eitt selskap, sum teir einki kennskap hava til. Hví hava vit ikki undirsøkt hvussu vorðið er við hesum selskapið, hvussu stórur aktiekaptalurin er, hvar tað hoyrir heima, hvar tað er innregistrera o. s. fr? Vit vita jú ikki petti annað um tað enn at har eru nakrir bestýrilsislimir: Petur á Heygum — fyri var talan um ein annan mann á Heygum, men hann hoyrist einki um longur, merkiligt nokk — Ingenior Wedén, departementchef Andersen, tað er alt. Og tað er tó nakað boteinkiligt at taka stilling til, tá so lítið er at halda um.

Hetta felagið kann fyrst skaffa 2 milliónir, tá staturin hevur garanterað fyri tær. Ja, tá kundi løgtingið ivaleyst eisini skaffa tær. Hví kann løgtingið ikki líkagott fáa statin at garantera fyri kommunur í Føroyum ella fyri amtskommununa? Hvat brúk hava vit fyri hesum selskapinum? Tað krevur forlods til egið brúk 350 hk. frá anleggjinum í Vestmanna — var tað ikki ólíka rímiligari, at Vestmanna kommunu kundi fingið tær? Tað uppskotið, vit í minnitalinum settu fram í fjor gekk út uppá at styðja kommununar, men hetta

selskapið vildu vit einki hava vit at gera. Tað er tann vegin, tingið eigur at ganga: vit anbefala til statsmyndigheitirnar, at statskassin leverar garanti fyri kommununum í Føroyum til uppbakilsi av tí láni, sum krevst. Tað kunnu vit við góðari samvittigheit. So springa vit tað privata selskapið forbí tí tað er nærmast ein óting, tá tað ikki sjálvt kann skaffa teir pengar. tað hevur brúk fyri. Andragandi úr Vági er tað natúrligt, at vit anbefala til statskassan og tað sama gera vit sjálvsagt við hini kommunalu andragandini eisini. Tá kunnu vit vera sikrir í at tær vatnkreftur, sum finnast, blíva verðandi á plássinum og ikki verða avreiddar í frammandar hendur. Viss legtingið skal til at fordeila kreftunum úr fossunum har vestri, út um landið, so kann tað verða meira ósikkurt, um tey nostbúgvandi fáa nógmikið. Eisini koma tey nærmastu at fáa kraftina dýrari um tey ollars behovdu, oftirsum prísurin er betingaður frammanundan yvirhøvur. Eg skuldi einki haft ímóti, at vit fordeildu hesar kreftur, viss ikki vatnkraft var aðrastaðni, men tað er tað jú. Tað er tí ein aldeilis hurtarspilt fordeiling, tað er bara at týna hesar kreftunar til skaða fyri tey nærmastu plássini og lata hinar liggja ónýttar. Fyrisovitt sum staturin garanterar fleiri milliónir til hetta selskapið, verður tað vanskuligari enn nú at fáa statin til at garantera fyri kommununrnar. Eg kvíði fyri, at tað vil hava til fylgi, at táið kommununrnar koma fram við sínum berettigaðu kravum um statsgaranti, so fáa tær einki. Men tað tordi verið eitt spursmál, um Føroyingar yvirhøvur eru tjentir við tað.

Tað fyrikomur mær, at vit hava lingið fatur á tí forkerta endanum á hesi sak. Eg havi nógv ímóti at logtingið velur revisor til hetta selskapið og ikki velur nakra nevnd. Tað vit kenna til selskapið ræður okkum frá at fyritaka nakað. Tá tað er sagt, at hetta selskapið ikki skal skaffa sær vinning, so trúgvi eg ikki uppá tað. Hetta selskapið má vol vera sum eitt hvørt annað aktiuselskap. Tað var hetur, um kommununrnar kundu lingið tað heila og so eisini lingið allan vinningin. Tá tingið yvirhovur imletur sog á hendan spurning, so skuldi tingið farið undir hann sjálvt. Í hesum viðurskifti mátti tað standið monn her á tingi, sum sogdu, at vit eiga at leggja so nógv inn undir okkum sum møguligt. Hálfverse vildi vera við, at nevndin hvorki hevur givið juridiskan ella moralskan garanti. Eg haldi, at tingið kundi geva bæði moralskan og pengaligan garanti fyri sakina skyld, um mænu trúi so fast uppá hana. Eg meini ikki bert við Fossá og Sørvagsvatn, men tær vatnkreftur, sum eru í Føroyum. Moralsk garanti fyri hetta selskapið er fult so farlig sum pengalig garanti. Tað er hvørt verri enn annað. Sum uppskotið hjá nevndini sær út, so fær maa tað inntryk, at hon hevur akceptera selskapið. Hetta aleina er nóg mikið. - - So varð sagt, at hendan sak hevði so ringar útsiktir til at kunna loysast av tí offentliga. Men eg haldi, at tað offentliga hevur lættari fyri at fáa pengar. Hesir privatmenn hava ongar pengar sjálvir og fíggjarnevndin hevði havt færri beteinkiligheitir fyri kommununum í Føroyum enn fyri privatmonnum. Vit mugu nú syrgja fyri at siga alt fyri eitt: Um staturin garanterar nakað fyri hesum selskapið, so má hesin garantiurin ikki koma í vegin fyri onnur annlegg. Um vit ikki siga tað, so eru vit for góðir við hetta selskapið. Eg vil tilráða nevndini millum 2. og 3. viðgerð at syrgja fyri, at tað kemur uppskot um, at um statskassin garanterar fyri hesum selskapi, so skal statskassin eisini garantera fyri øðrum selskapum ella kommununm. sum vilja nýta sínar áir og fossar. Tað hevur verið talað í bravi frá Wedén um eitt svar, sum kom frá finansnevndini til hetta selskapið, at tað má vera garanti. Finansnevndin hevði akceptera hesa sak áðrenn og fór úr Keypmannahavn. Eg talaði við teir, men eg hoyrdi einki um at teir høvdu fyriskrivað nøkur betingilsir fyri hetta selskapið. Og tí trúgvi eg ikki, at finansnevndin hevur skrivað soleiðis til selskapið sum Wedén sigur. Tað var stillað uppskot til finansnevndina at binda ministeriið til at garantera 2 mill. kr. Ministarin tók uppskotið aftur. Hetta var skett í finansnevndini, tá eg fór úr Keypmannahavn. Nú letur tað til, at finansnevndin hevur svarað. Eg stuttleiki mær til at fáa tað nærmari undirsekt. Eg skal siga, at eg ætli mær til at stilla broytingaruppskot um, at vit biðja, at staturin vil stvðja kommununrnar til útnyttilsi av vatnkraft í Føroyum. Eg kann ikki vera við at biðja um studning til eitt selskap, eg ikki kenni. Og eg vil ikki vera við at velja revisor ella nevnd av logtinginum til at forhandla við eitt selskap sum ikki vil upplýsa nm, hvussu tað er vorðið við tí. Eg haldi, at finansnevndin vil krevja tær somu upplýsingar, sum eg havi biðið bestýrilsi fyri selskapið um. Teir sum vilja, at finansnevndin skal forstanda hesa sak rætt, vil eg biðja seta slíkt punkt upp: at tingfleirtalið vil ikki

ganga við til at garantera við pengum fyri hetta selskapið. So forstendur finansnevndin, hvussu stillingurin er í tinginum.

J. Patursson: Eg eri fegin um at tingið er samsint í hesi sak. Og og ivist ikki í at eisini Føroya ríksdagsmenn vilja vera samdintir um at fremja hetta mál á besta hátt.

Formaðurin: Ifølge sit Indhold vil denne Sag kun være at underkaste 2 Behandlinger. Der vil blive stemt om Udvalgsforslaget.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Broyting í skjútslógini.

2. viðgerð.

D. J. Thomsen greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at geva fleirtalsuppskotinum atkvøðu.

Joen Rasmussen greiddi frá minnitalsálitinum.

O. Effersøe: Spørgsmaalet om Ændringer i Skydsordningen har ligget for i Lagtinget i længere Tid. Det er forstaaeligt, særlig i Betragtning af, at Skydsbyrden hovedsagelig paahviler en Del af Befolkningen, som ofte har mindst Evne til at yde noget til Samfundet. Men Sagen er overordentlig vanskelig at ordne tilfredsstillende. Samfundspligten kræver, at baade private Rejsende og de, der rejser i offentlige Ærinder, skal have Befordring. Det er aldrig tidligere lykkedes at finde nogen virkelig gennemførlig Løsning og det er Spørgsmaalet, om man nu har fundet en saadan. Ganske vist er det lettere nu, idet Befordringsmidlerne er udviklede meget gennem Tiderne og særlig i de sidste Aar, saa at man nu kan sige, at der af det offentlige er gjort tilstrækkeligt til, at vi kan lade den private Skyds bortfalde. Tilbage bliver saa Spørgsmaalet om vi kan lade den offentlige Skyds bortfalde. I det Syssel, hvor jeg bor, er Skydsbyrden en saadan, at det nærmest er en Bagatel, som ikke er værd at tale om. Ordføreren talte om visse Ulemper, men disse gør sig ikke gældende i det praktiske Liv, i hvert Fald ikke efter min Erfaring. Overhovedet hvor jeg har færdedes paa Suderø, er det altid lykkedes mig at faa saadanne Personer i Skyds, som ikke forsømte nævneværdigt ved det. Jeg rejser ofte paa den Maade, at jeg lejer Motorbaad, og sender saa Regning bagefter for at faa mine Udlæg godtgjort. Men der forekommer dog Tilfælde, hvor jeg ikke vel kan tænke mig at vedkommende Sysselmand kan komme afsted, selv om han betaler meget godt, hvis der ikke var Skydspligt. Jeg vilde i hvert Fald føle mig meget usikker, hvis jeg skulde være til absolut bestemt Tid et Sted og saa ikke vide, om jeg kunde faa nogen at bære mit Rejsegods. Det er jo ikke saa meget den større eller mindre Betaling det drejer sig om, den frembyder ingen Garanti for, at man kan komme frem. Man risikerer ved denne Ordning, at det Offentlige ikke faar sin Tjeneste udført. Min Tid som Tjenestemand er ikke saa lang nu, at jeg jo kan lade mig det let, men der kommer vel nogen efter mig.

For Præsternes Vedkommende er Forholdet vel nærmest det, at de har været saa lidet fordringsfulde; for Suderøernes Vedkommende i hvert Fald er disse Forhold ikke særlig vanskelige. Et Spørgsmaal er det dog, om den Ordning, der her er foreslaaet, kan gennemføres eller ej. Det skal ske gennem Overenskomst mellem Menighedsraadene og Præsterne, men om der ikke kan skabes en saadan Ordning, hvad vil man saa gøre? Naar vi behandler Spørgsmaalet om Præsteskyds, gaar vi vel ikke ud fra, at Beboerne paa det Sted, hvorfra Præsten rejser, besørger Skydsen, jeg gaar ud fra, at den fordeles paa en mere tilfredsstillende Maade. Det bliver nærmest et Mellemværende mellem de paagældende Distrikter og Sognepræsten. Men hvis det skal arrangeres paa den Vis, at Skydsbyrden skal væltes over paa Præsterne, saa bliver Sagen betænkelig. Det vilde interessere mig at høre, hvad Provsten mener om det. Skal saa Amtmanden heller ikke kunne kræve Skyds? Hvis Sysselmanden skal skaffe sig en Mand til at befordre sit Rejsetøj, saa vil det falde nok saa kostbart. Om jeg befinder mig i Kvalbo og skal til Tverøa, saa maa jeg enten have aftalt med en bestemt Person eller se af faa en Mand til at bære mit Tøj til Tverøa. Det vil ofte falde vanskeligt og det vil blive dyrt. Jeg er ellers ikke saa bange for det, men for nogle af de andre Sysselmænd vil det maaske falde endnu mere kostbart. Vi maa se at finde en Løsning for denne forandrede Form for Rejser.

J. H. Poulsen: Orðføraríin nevndi, at lógin ofta hevði verið fyri á tingi. Tá hon var fyri í 1898 var eg við til at leggja spreingikrøtt undir arkina. Nú vóni eg, at vit fáa kál á hesi lóg, sum er ein leivd frá miðaldini. Tað sárar og upprørir, at fólk kann takast til at gera fanasta fyri ein annan. Og hartil er hetta ein klasselóg. Eg eri tí fegin um, at mann nú vil skera hesa lóg á háls. Eg havi verið 2- -3 ferðir við at behandla hesa lóg í tinginum. Tað varð tá m. a. sagt, at tá samferðslan bygda na millum kom í hampuligt lag, var tíð at taka lógina av. Eg haldi, at vit kunnu taka hana av ná. Eg minnist, at eg var við at framseta uppskot í 1898, at um vit skuldu behalda lógina, so skuldi hon galda allar borgarar í landinum javnt. Effersøe helt, at í sínari sýslu føldist ikki skjútslógin sum nøkur stór byrða. Tað er tó stutt síðani, at tað kom bønarbrøv úr Tvøroyri at hjálpa teimum móti skjutslógini. Har var tað mesta fólkið burtur við fiskiskipum og teir fáu, sum eftir vóru koma at liggja undir allari byrðuni. Av skjútstreiðslunum fyri Suðroy sæst, at Effersøe hevur verið ógviliga humanur við at skjútsa fólk. Hann mann bava ferðast nógv einsamallur. Men Suðroyin er eisini toliliga væl skikkað til at ferðast í. Onnur pláss eru mong ring. Tað var jú stutt síðani nær komið til skandalu í einum plássi har fyri norðan. Eg veit ikki, um hesir menninir eru mulkteraðir enn. Kannske hevur mann uppgivið hesa sak fyri sá bad jobbo. Tað er einki skil á, at maður, sum kemur til bygdar og ikki tímir at bera skreppu sína, skal kunna taka ein mann til klæðsekksdrong, tá hann finnur tað fyri gott. Skjútslógin hevur verið til ólempu fyri nógvar bygdir. Tað verður kannske dýrt at avskaffa skjútsin hjá sýslumonnunum, og eg veit ikki, um vit skulu fiksera útreiðslurnar. Teir útreiðslur vera vist ikki so stórar. Eg eri ikki bangin fyri teimum. Men tá fólk vil sleppa frá nøkrum, sum er ein ólompa, so mugu tey betala fyri tað. Tað kunnu væl vera tey ting her, sum volda vanskiligheitir. Men privat skjúts má avskaffast. Men annað kann vera: t. d. mugu valgbrøv befordrast í eygablikkinum. Og tað kann vera, at fútin skal ferðast óupphaldiliga. Men fyri tað mesta kann mann fáa fólk fyri løn og eg hugsi ikki, at nanna skal renna frá Herodes til Pilatus. So er tað prestaskjúts. Hetta vil eg bara yvirláta til at vera ein sak fyri meinigheitirnar. Tað er ein privat sak fyri meinigheitirnar, at prestur kemur at predika. Eg haldi, at tað kann ordnast frivilliga at flyta prestin. Tá mann hugsar um Dímun, so kunnu Dímuningar ikki heinta prestin; teir kunnu tó ordna seg við aðrar. Men mann skal ikki kunna tvinga fólk. Hetta má vera ein privat sak fyri menigheitsráðini; tey mugu kunna ordna hetta.

O. Effersøe: Forholdet angaaende den Klage, der skulde være kommet fra det Sted, hvor jeg bor, er ikke til Stede længer. Det er ellers meget uheldigt, at Sager af den Betydning og Omfang, som denne, ikke er fremkommet før i Tingsamlingen, saa der kunde havo været god Tid til at behandle de n.

Joen Rasmussen: J. H. Poulsen sigir, at hetta má vera ein sak millum prestin og menigheitsráðini. Men hvussu skal vera har sum eingi meinigheitsráð eru? So er tað eisini ein onnur vanskiligheit, nemliga mátin við líkningini. Forstandarskapini vera væl ikki glað yvir at skulu skilja út, hvør sum hoyrir til fólkakirkjuna og hvør sum ikki hoyrir til hana. So er tað fordeilingin av útreiðslunum til prestin. Har sum prestur býr, hevur mann mestan skjútsin. Skal so hvørt einkult forstandarskap betala tann skjáts, sum fólk innanfyri forstandarskapið hava? Eg haldi, at hettar eru spurningar, sum átti at liggja frammanfyri forstandarskapið at úttala seg um.

Prósturin: Tað er eyðvitað, at tá sakin um at avloysa prestaskjúts liggur frammi, verður spurningurin um prestaskjúts ein av teimum viktugastu. Prestarnir nýta nógvan skjúts. Hvussu prestarnir koma at dáma hesa skipan, dugi eg ikki at ætla. Fyri nokrum árum síðani var hesin spurningur til viðgerð her á tingi, og tá vóru prestarnir spurdir. Hesa ferð eru teir ikki spurdir. Eg skal loyva mær at siga nøkur fá orð um, hvussu eg síggi á hetta — fyrst um prestarnar og hinar embætismonnini, sum allir vóru mulir somu lagnu av fyrstan tíð. Var tað amtmaður, dómari ella fúti og sýslumaður hovdu teir ongan annan máta at ferðast enn við skjútsi. Teir fóru til gongu og við báti sum best hóskaði. Men hettar er broytt gjøgnum tíðirnar. Tá nú amtmaður, fúti og skrivari ferðast er tað ikki longur á gomlum máta. Teir nýta orlogsskip ella onnur skip og motorbátar og fer sum eru fyri hond. Og sýslumenn ferðast á nakað líknandi hátt. Men prestarnir liggja eftir. Teir ferðast sum í gomlum dogum, til gongu og til báts. Teimum nyttar ikki at taka motorbátar og senda rokning til skjúts-

kassan. Teir fáa tað ikki aftur goldið. Har er komin ein munur millum prestar og aðrar embætismenn í teirra ferðalátum. Í hvussu er, hetta er ein so umráðandi sak, at hetta má hugsast væl um, hvussu hetta skal setast í verk. Prestarnir skulu runt í teirra prestagjaldi, og tað má hugsast, um, hvussu tað kann orðnast, so tað verður gjørt teim møgiligt at koma til ymsu kirkjur til tí ásettu tíð. Tað er ójavnt at ferðast, ójavnt í teim ymsu prestagjøldum; ólika lættast er tað, táið fast er undir fótum, til hátsferðir krevjast 4—8 uppí 10 menn eftir veðrinum. Prestaskjúts hevir ligið tóliliga javnt á allar bygdir, sjálvt tær, hvar prestur býr. Tá spurningur er um, hvussu hetta skal koma í eitt annað lag, eri eg eitt sindur í óvissu um, hvussu hetta fer at virka, sum er skotið upp, serliga av fleirtalinum. Meinigheitsráðini eiga ongan pening og hava ikki atgongd til at fáa pening at ráða yvir. Enn meira eru nógvar sóknir, hvar eingi meinigheitsráð eru, og tað kann man kanska rokna við, at tað altíð vilja vera bygdir utan meinigheitsráð. Meinigheitsráðini kunnu so skjóta hetta frá sær til kommununrnar, so at tær t. d. avloysa hetta við peningi. Eg haldi tað vera beinast, at prestaskjútsin skal avtakast í sínum gamla formi, men at ein fær viðurlag fyri at flyta prest. Hvør ið skal betala hetta, kann so verða avgjørt; eg haldi tað eigir at vera kommununrnar. So er tað ein spurningur, um hetta kann líknast uppá allar í kommununi, eisini á tey, ið eru utan fyri fólkakirkjuna, har haldi eg, at tað er óvist, um tað ikki kann býtast javnt á øll í kommununi. So er í uppskotinum frá minnitalinum sumt, sum mær dámar væl. Men postbátarnir sigla ójavnt, sumir fyrrapartin í vikuni, og presturin kann vera forðaður í at fara fyrrapartin í vikuni. Eg veit, at summastaðni í Føroyum ferðast presturin við postbátinum, serliga har, hvar ið langt er til útoyggja, t. d. í Norðuroyggjum. Annars dámar mær uppskotið frá minnitalinum best.

J. Guttesen: Eg havi eisini verið limur av útvalginum og havi gingið við til, sum J. H. Poulsen segði áðni, at kappa høvdið av skjútsleypinum. Allir eru samsintir um, at benda núverandi skjútslóg er so foroldað, at hon má avloysast, men menn eru eisini ymiskir á máli um, hvussu hon skal avloysast. Vit eru kortini í navndini komnir á samt um at geva eitt uppskot um, at øll privat skjúts skal avtakast. Men so er tað spurningurin um embætisskjúts. Har talaði sýslumaður Effersøe um, at tað kann vera tvørligt at ferðast fyri sýslumennirnar, táið teir ikki kunnu taka skjúts. Ja, tað kann vera, men til almindiligar ferðir hevir sýslumaðurin væl altíð ein kallsmann við, og hevir sýslumaðurin nakað at bera, so ber kallsmaðurin gjarna byrðina, og fær eitt viðurlag aftur fyri. Um sýslumennirnir hava eitt sindur av stríð, so er tað kannska ikki so órættferðugt, tí fólkið hevir nógv stríð av hesari plikt. So er tað prestaskjútsin, ið tykist at vera tað mest tvørliga at fáa avloyst. Hetta hevir verið ein tung plága, ið hevir ligið á fólkinum, og ikki á øllum fólkinum, men bert á einum parti. Eftir okkara uppskoti skulu meinigheitsráðini skaffa prestunum flutning, og so senda rokning til kommununa. Tingmaðurin úr Soyrvági helt, at tað vildi vera eitt stórt stríð fyri forstandarskapini at undirsøkja hvør ið er í fólkakirkjuni og hvør ikki, men søknirnar eru vanliga so smáar, at man væl altíð veit, hvør ið er í fólkakirkjuni ella ikki.

Joen Rasmussen: Eg segði ikki beint soleiðis sum Guttesen sigir frá; eg segði, at tað ikki var uppá tað rætta plass, at forstandarskapini skuldu fara at skilja út, hvør ið skal vera í fólkakirkjuni og hvør ikki skal vera har.

J. H. Poulsen: Hatta, Jógvan Rasmussen sigir, er skeivt. Tað eru ikki forstandarskapini, ið skulu skilja út, hvør ið er í fólkakirkjuni, men uppskotið sigir, at um prestaskjútsin verður avloyst við peningaviðurlag, skulu kommununrnar líkna hesa útreiðslu við javnstórum beløpi á allar borgarar, ið eru í fólkakirkjuni. — Man kann ikki fastseta eitt bestemt beløp utan at tað má kunna broytast innanfyri eitt vist áramál; tí ferðaútreiðslur vilja lætt kunna broytast í støddd; eg vil tí skjóta upp, at hetta skal takast upp til revisión um 5 ár. — Táið presturin verður heintaður til brúdleyps ella ein maður vil hava prestin til okkurt annað til sín sjálvs, so heintar hann prestin sjálvur, og tí haldi eg tað vera beint, at táið ein bygd vil hava prestin til sín at prædika, so eiga bygdarmennirnir sjálvir at heinta hann ella bera kostnaðin við flutningi. Eg trúgvi, at tað verður eitt betri forhold millum prest og meinigheit tá enn nú.

M. A. Winther: Nógvir halda, at tað verður eitt hol eftir, ið eingi kann fyllast í, táið hendla lóg verður avtikin, og tað er nakað um tað, hetta er ein spurningur ið er fløktur at greiða. Men hevir nakar nakrantíð trúð, at vit kundu taka skjúts-

lógina av, utan at eitt sakn var eftir? Vit hava nú hatt skjútslógina so leingi at takast við her á tingi, ár undan ári, og vit hava verið noyddir at útseta avgerðina ferð eftir ferð, tí vit ikki sóu nakran góðan loysning. Eg haldi tað vera beinast tú at skera hálsin av lógini, heldur tað, so er hetta órættvísa byr i burtur, og so kunnu vit betri seinni, táið vit rætt síggja, hvørj r ólempur koma av tí, bøta um tær. Tað gerst ikki fyrrenn vit fáa skjútslógina avskaffaða. Vit kunnu sjálvsagt gott útseta sakina til næsta ár, men vit finna ongan betri loysning fyri tað. Tað er nú blivið eitt so sterkt fólk krav at blíva av við tann offentliga skjútsin, at fólk noktar ein fyri annar eftir at útføra hann. Hvat er her at gera? — seta fólk í Skansan fyri tað? Tað kann man skamm ikki. Tað eru jú ikki bert einstakir menn, tað era heil bygdalog, sum nokta og standa solidarisk í teirra noktan. Eg kenni tað sum sýslumaður, eg noyðist at hoyra uppsagt dag og dagliga klagur um hesa vanhukku skútsbyrði. Og tað sama er við prestaskjútsinum. Her er einki annað at gera enn bara at fáa hann avskaffaðan — tað kann ikki ganga verri enn nú. Eg havi haft fyri undirsøkilsir um noktan av prestaskjútsi -- tey fylla uppí ein stóran leyp. Og man kemur jú ongan veg — Sandingar standa líka steilir enn. Skjútslógin er beinavegin ein hindring fyri ordnaðum forholdum. Vit mugu fáa hatta misforhold av vegnum, eingin kann við nokrum rætti lougur forsvara skjútsordningina. Tann einasta máti at avlíva lógina uppá er tann, útvalgsfleirtalið fyrisløer. Vit kunnu ikki forsvara at útseta sakina.

Th. M. Strøm: Her hevur verið nógv tosað um hesa sak og eg skal ikki leggja stórt aftrat, men tá Hjørsøe sigur, at sakin hevur soverordentligo Vanskeligheder, so má eg siga, at tað er væl rætt nokk, men vanskiligheitir eru væl til fyri at yvirvinnast. At bátar ikki eru komnir í forleyinheit av tí, at menn eru tiknir skjútsins, kann kanuska vera rætt, hvat Suðroynni viðvíkur, men man tað ikki vera líkt norðanfjørðs? Eg trúgvi tað. Í Suðroynni havi eg hoyrt Gullak Jacobsen prest siga frá at hann einaferð var vartur við at maður var tikin frá einum báti til skjútsins, og hann setti seg tá til árarnar í mansins stað. So tað hendir eisini har suðuri. Tað mesta, fólk hava ímóti skjútsordningini er tað, at hon er ein órættur, sum verður gjør ur móti ella-i-gimsin, við tað, at skjútsbyrðan mest sum útilukkandi fellur á arbeiðsfólkið, sum her verður tvingað til at arbeiða fyri so gott sum einki. Prestar og aðrir embætismenn eru væl til fyri allan befolkningin, og ikki bert fyri arbeiðsfólk; tað er tað offentliga, sum hendir samfundsbyrðan áhvílir, men tað offentliga eru væl vit øll. Tað er nettupp gott, at skjútsurin verður betalur av kommununum eftir fólkatalinum; tá menn verða líkliga betaltir, fast nokk fólk til at besyrgja skjútsins sovni sum annað arbeiði.

M. Samuelsen: Allir eru væl einigir í tí, at kunnu vit fáa avloyst skjútspliktina uppá ein heldugan máta, so er tað gott. Tað privata skjútsið kunnu øll vera ónug um at avskaffa, tí tað er ógviliga forargiligt, at ein maður skal rykkjast hurtur frá lønandi arbeiði bara tí ein privatmaður ikki gitur bera sína viðførl sjálvur. Verri er tað við sýslumannaskjútsinum, tó tað kanuska kann vera nokkso heldugt sum fyrisligið er, men prestaskjútsið er tað ringasta. At meinigheitsráðið og presturin altíð kunna einast um tað, man vera nakað ósikkurt at líta á. At leggja prestaskjútsið á kommunan nar haldi eg vera heldur beteinkiligt; hetta byrðan fer at falla ójavn og óforholds messiga fung á prestbygdirnar. Sjálvt um tað er ein kortur vegur, presturin biður fólk, f. ex. frá Kvívík til Vestmanna, so er tann dagurin spiltur hjá skjútsmanninum. Eg hevði hildið tað verið best, um tað kundi komið ílag, sum Johan Henrik Poulsen fyrisløer, at prestaskjútsið verður ordnað at frivilligum veg, soleiðis, at meinigheitsráðini orðna tað sínamillum innbyrdis. — Vit kunnu ikki koma utanum tað, at fleiri prestar og aðrir embætsmenn betrakta hetta sum eina byrðu, sum áhvílir fólkinum. Eg trúgvi ikki teir taka stórt hensýn til tað, um kommununrnar koma at hetala. Í heila tikið kann eg sh tta meg til, at skjútspliktin verður avloyst, men binda kommununar til at betala prestaskjútsið, tað eri eg nakað beteinkiligur við. Útgiftirnar verða tá nógv storri enn eftir skjútstaxtinum.

J. Gutteson: Niklkjal Sámalsson heldur at meinigheitsráðini og prestarnir noyvan fara at koma yvireins. Tað forundrar meg. Meinigheitsráðini eru væl vald til at vara taka tær kirkjuligu interessurnar og tað mátti tí verið teimum ein høvuðsuppgáva at royna at syrgt fyri, at presturin so ofta sum muguligt og á besta máta kom til tey bestentu plássini. So er Niklkjal Sámalsson hekymaður fyri at prestbygdirnar skulu fáa tann mesta skj tsin - - tað máttu prestur og meinigheitsráð saktans kunna ordna so, at tað ikki var .

A. Samuelsen: Eg erkenni, at prestaspurningurin er vanskiligur at ordna. Meinigheitsráðini eru ikki heilt organiseraði og tí er ikki so gott at yvirføra ordningin av spurningunum til tey. Tað er ólagaligt, at vit í lógini fyriseta hvat hvør einstakur sýshumaður skal hava. Vit skuld: bara siga, at sýslumannsskjúts betalist av skjúts kassanum og ikki hava nakað um tað í lógini. So kann tingið bestemma hvussu nógv sum skal latast; tí tað er vanskiligt at seta nakað fast. Summir av sýslumonnunum vera fyri nógvum útreiðslum til ferðir, summir fyri smáum útreiðslum.

M. Samuelsen: Eg vil siga nakað til Guttesen viðvíkjandi meinigheitsráðini og prestarnar. Um tey bliva einig, so eru skjútsmenninir eftir. Meinigheitsráðið hevur onga avtoritet yvirfyri teimum. Tað kann ikki siga, at hasir og hasir menn skulu í skjúts. Men hetta útilukkar tó ikki, at tey vmisku meinigheitsráð at frivilligum veg kundu koma til ein fastan ordning; tí tað hevur verið so, at tann maður, sum hevur viljað hava prestin, hevur heintað hann sjálvur. — Tað var einaferð ein prestur, sum ætlaði at ferðast um til at predika umframt tær vissu umreisur. Men hetta strandaði júst uppá skjútsspurningin. - Prestaskjúts hevur í Norðstrey . oy einans verið 6—7 ferðir um árið.

J. Rasmussen: J. H. Poulsen og M. Samuelsen hildu, at man best ordnaði tað so, at tann maður, sum vildi hava prestin, heimtaði hann sjálvur. Men páleggur mann ikki fólki við hesum eina plikt. Menn í átoyum vera ikki tilfriðs við hetta; teir skuhi hava átta menn eftir prestinum og átta menn avstað aftur við honum. Tá Guttesen sogði, at man skal ordna seg við meinigheitsráðini, so eru jú ikki meinigheitsráð allastaðnis, og man kann ikki tvinga fólk at danna meinigheitsráð. Eg meini, at prestaskjúts skal avskaffast, men eg vil ikki avskaffa hendan skjútsin uppá ónatúrligan máta. Tá A. Samuelsen kemur fram við tøhunum, sum vit hava sett fyri sýshumannskjúts, so vil eg yvirveja tað til 3. behandling, um tað ikki er fornuftigt at yvirláta hetta til løgtingið.

D. J. Thomsen: Nógvar vanskiligheitir halda menn her vera við at avskaffa skjútsin. Men hin størsta vanskiligheitin er at behalda skjútsin. Tað er mangur maður, sum heldur vil bera fyri sín annan mann fyri einki av fríum vilja enn at vera tvingaður og fáa eitt sindur aftur fyri. Tað er undarligt av Lfferssoe, tá hann sigir, at hendan sakin skuldi vera komin fyrr frá nevndini. Men hendan sakin hevur tó verið í 10 ár frammi í tinginum og er onga leið komin. Og so seint sum í 1917 fekk hon eitt nevndarálit sum var 1½ regla til longdar. Sum sakin nú liggur fyri, kann man antin livga hana ella taka lívið av honni.

M. A. Winther: Eg haldi eisini, at tað er rætt, at sýslumannsskjútsurin skal fastsetast av tinginum. Eg forstandi ikki, at nevndin er komin framm við hesum bolopi. Hetta má setast framm á annan hátt.

Prósturin: Hvat sum verður samtykt, so verður eftir míni meining pliktin eftir, flutningspliktin eftir undir einum ella øðrum formi. Tí sum M. Samuelsen segði: onkur má gera hetta arbeiði at flyta sýslumenn og prestar og aðrar. Antin arbeiðið verður gjort av meinigheitsráðum ella kommununum, so vil tað koma at liggja sum ein plikt á teimum, sum skulu gera tað at flyta hesar menn. Hovuðsmeiningin hjá fleirtalinum er at meinigheitsráðini onga myndugheit hevi til at láta fólk avstað. Sum menniskjan er verðin, má man rokna við øðrum mogaligheitum enn tær allar bestu. Tá tað nú skulu fara 10 menn, og teir ikki vilja fara góðvilliga, og aðrir ikki fáast, hvat so? Man kann stogga. Men tað kann verða tað sama mesta ferð. - Tað er munur millum prestarnar og hinar embætismenninar í teirra ferðum. Og her er eisini gjordur ein munur millum prestarnar. Hví ikki gera tað samaleiðis fyri prestarnar og hinar? Her er skilað til, at sýslumenninir skulu hava so og so nógv fyri teirra flutning; men fyri prestaskjúts er lagt eitt heilt annað grundarlag. Hví ikki eisini lata teir fáa ein ávísan pening at ráða yvir at ferðast fyri eins og sýslumennirnir. Eg dugi ikki at luta, hvi man skal gera hendan mun. So eiga vit heldur at hava tann gamla mátan, soleingi eingin betur er.

D. J. Thomsen: Eg vil sjálvandi vera við til at fremja sakina á besta máta, og tað standur jú hvørjum tingmanni frítt fyri at framseta broytingaruppskot.

Jacn Rasmussen: Eg skal siga til Winther, at eg vil gjarna vera við til at kappa hovlið av lógini, men eg eri bangin fyri, at hon vil ganga illa aftur. Annars má eg siga, at eg halði ikki at ordningin við meinigheitsráðunum er góð; tað vil enda við

tí, at teir stakkals menn ið eru limir av meinigheitsráðunum, verða noyddir at flytja prestin sjálvir. Enn er ikki framkomin ein natúrligur máti at broyta prestaskjútsin uppá.

M. Samuelsen: Jógvan Rasmussen segði, at tann ordning, eg fyrisló fyri prestaskjúts, var ikki heldug, t. d. vísti hann á, at Mikinesmenn so skuld í ró eftir presti til Seyrvágs og síðani flutt hann til Seyrvágs. Men eg meinti, at tær ymsu sóknirnar tosaðu seg saman um at flytja prest. Hatta sum prósturin fyrisló, at prestarnir skuldu fáa pengar uppá sama máta sum sýslumennirnir, hatta talaðu vit um eitt kvøld utan fyri útvalgið, men tað má ju vera nakað, útvalgið er komið frá. Eg skal vera við til at avloysa skjútsbyrðina á ein rættferdugan máta, men hann er ikki framkomin enn.

R. Nielsen: Eg sympatiseri mest við uppskotinum frá fleirtalinum; eg livi nevniliga millum menn, ið hava haft stórt stríð av prestaskjúts; men eg hevði tó best sympatisera við einum uppskoti um, at teir menn, ið hava brúk fyri presti, skulu sjálvir betala fyri hansara flutning. Teir ið ikki hoyra til fólkakirkjuna, hava einki við útreislurnar til hana at gera og teir áttu at vera fri fyri hesar útreislur.

N. Debess: Eg eri samsintur við teir, ið vilja avtaka skjúts og eg kann fyri so vítt fylgja M. A. Winther í hansara nakað radikala uppskoti. Men mær dámar ikki rættuliga sum tað er ætlað at avloysa prestaskjúts, mær vildi betur dáma, at tað varð ordnað á sama hátt við prestum sum við sýslumonnum. Eg vóni, at broytingaruppskot herum verður framsett við 3. viðgerð.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur fríggjadag 19. september.

Lækni í Fuglafirði.

2. viðgerð.

Orðføraríu (R. Nielsen) greiddi frá álitinum og uppskoti meirilutans.

A. Samuelsen greiddi frá minnitalsálitinum og legði aftrat: Eg siggi at fleirtalið er komið við einum øðrum forslag, sum gongur út úppa at goyma hesa sakina. Hetta er tann einasta av doktarasakunum, sum íar er ætlanin at goyma. Hinar sakir eru allar framdar. Fleirtalið í nevndini sigir, at grundin er, at tað ikki liggur orkloring frá Gotu, Leirvík og Oyndarlíði. Er tann hugin fyri, at forstandarskapið í Fuglafirði ikki er mont at uppfylla hesi forpliktilsir utan at fáa hinar søknirnar at hjálpa sær? Um løgtingið heldur at Fuglafjørður vil ovtaka seg av hesi byrðini, ja, so kann tingið stogga sakini. Tá man ikki ivast í, at plássið troingir til ein doktara, so haldi eg, at tingið ikki skuldi gjørt vrøvl. Tinginum nýtir ikki at frykta; tí forstandarskapið í Fuglafirði loypur risikoin. Løgtingið sigir, hví tað ikki vil fremja hesa sak: Vit hava einki álit á, at tann økonomiska evnan í Fuglafirði er so góð, at teir kunnu bera hetta. Men tá mann ikki vil fremja eina sak, so má man finna uppá okkurt. Tað sær ikki gott út, at man sendir hinar sakirnar til ministaran, meðan hendan sakin fer til amtmannin. Men fleirtalsins uppskot verður natúrligvis samtykt her. Eg skal tó í tí treysti, at tað kundi henda, at tingið fyri einaferð yvirtreffur mínar forvantningar, anbefalla tað innstillingspunkt, sum minnitalið hevur stillað, og eg eri fegin yvir, at eg havi verið við til at fremja allar hinar doktaraspurningarnar.

S. P. ár Kongi: Eg havi hoyrt hvat bæði ordføraríu fyri fleirtalinum og fyri minnitalinum hava sagt. Nú eri eg búgvandi í tí laknadømi, ið talan er um at uppraðla og eri formaður í Gotu sókn, so og vil tí siga nokur orð. Eg kann í hovuðssakini vera samsintur við ordføranum fyri minnitalinum um tað gagnliga í at fáa lækna í Fuglafirði, men eg má siga, at táið talan er um at fremja eina sak, ið er so týdningarmikil fyri framtíðina, standur man sog við at framseta ikki bert tær ljósu síðer við sakini, men eisini tær myrku, so man ikki aftaná skal angra at hava handlað í bræði. Tað er so ógvuliga nógv broytt í háttinum at ferðast á millum bygda síðani 1902, og staturin hevir jú gjørt sítt til at geva lækonunum betri far at ferðast við. Vit mega fáa vissu um hetta er ein spurningur bert um løgmálina Fuglafjørð, ella um her er tala um at upplýsa eitt uppland. Ordføraríu fyri minnihlutanum rokmæli fyrst og fremst við Fuglafirði, síðani sjálvsagt við Oyndarfirði og Hellunum, men eisini við Leirvík og Gotu. Eg meini, at vit sum fast uppland til

læknans í Fuglafirði, bert kunnu rokna Oyndarfjørð og Hellunar; úr Lorvík vil tað vera ivingassamt, um fólk vil fara til Klaksvíkar ella til Fuglafjarðar; tað fer at avhanga av, um fólki betur dámar læknan í Klaksvík ella hann í Fuglafirði. Viðvíkjandi teirri sókn, eg eri frá, eru vit nærri Fuglafirði enn Havnini; men at gange til Skálafjarðar úr Gotu ruknast ikki fyri nakað, og Ruth siglir hvønn dag, og eg trúgvi væl, at fólk úr Gotu vil sokja nógv til lækna í Havn, um har kemur at sita ein lækni í Fuglafirði, ið ikki vinnur fólk fyri sog. Ég haldi, at táið sæst heilt objaktivt uppá hesa sak, kunnu vit bert rokna heilt sikkurt við Fuglafirði, Oyndarfirði og Hellunum. Eg má sum formaður í Gotu sókn eiga, at mær hevði dámað betur, um hesin spurningur var lagdur fram fyri sóknarstýrunum í teim kommununum, sum ætlað er at leggja undir hetta nýggja læknadømi, um kommununar vildu vera við til at lata peving til læknans. Tað er sjálvandi gott, um Fuglafjørður, ið nú hevir 500 íbúgvar, sigir seg at vilja garantera 1000 kr. um árið og byggja læknanum hús, men um tað var framlagt fyri hinum sóknarstýrunum, haldi eg, at vit vildu verið við til at garantera lønina og tikið lut í húsabyggingini. Eg má tí vera samsintur við meirilutanum í, at sakin eigur at vera útsett til næsta ár, so hon kann verða meira upplýst; hon er, sum nú er forhandað, og eg trúgvi, at vit eiga at hugsa um ikki allir suðurmarkin av Eysturoynni eigur at leggjast undir hetta læknadømi. Eisini Skálafjørður treingir til lækna, og tað er ein spurningur, um vit ikki samtíðis við at hjálpa Fuglafirði mega hugsa um eisini at hjálpa teimum. Eg trúgvi ikki, at tað hevir so ógvuliga nógv at týða fyri fólkið har norðuri, um vit bíða eitt sindur, fram fyri at fáa tann besta loysning av hesum máli; vit hava ein sera dugandi og raskan lækna í Norðuroyggjum, og trúgvi ikki, at tað nakrantíð hevir verið klagað yvir, at tað hevir verið trupult at fáa lækna til bygdanna, sjálvt tá hann hevir haft nógv um at vera. — Eg ynski, at sóknirnar verða spurdar, um tær vilja átaka sær økonomiskar byrðir fyri at fáa lækna í Fuglafirði. Eg dugi ikki at fata, hví Fuglfirðingar nú so knappliga skulu hava hetta á máli; eg havi sitið í stýrinum fyri sjúkrahúsinum í Klaksvík í mong ár, og tað er jú eisini sjúkrahús fyri Fuglafjørð, men eg havi aldri lagt til merkis, at hetta hevir haft so nógv at týða fyri Fuglafirðingar at fáa í lag, hartímóti hava teir vert seg ógvuliga væl fyri at taka ov stórar peningaligar byrðar uppá seg til sjúkrahúsins. Ég vil mæla til, at sakin verður útsett eitt ár, so súknarstýrini kunnu fáa loyvi at útbreiða seg.

A. Samuelsen: Eg hevði tonkt mær, at orðforarin fyri fleintalinum vildi svara uppá teir tveir spurningar, eg setti fram til hansara. Orðforarin hevir einki sagt um tað; harímoti hevir tingmaðurin úr Gotu haft orðið og er komin nakað inn uppá báðar spurningarnar, so tað kann vera, at rollurnar eru umskiftar, og at orðforarin hevir yvirdrigið til tingmannin úr Gotu at svara fyri seg. Tingmaðurin úr Gotu meinar, at man bert kann rokna við fólki úr Fuglafirði og Oyndarfirði, ið vil sokja hendu nýggju doktara í Fuglafirði. Eg havi um hendu spurning sagt, hvat man kann dema eftir teim geografisku forholdum, hvussu fólk í teim ymsu bygdum er sinnað til at fara eftir doktara, er ein sak, eg ikki skal úttala meg um. Tingmaðurin úr Gotu meinti, at vit kundu ikki rokna við Lorvík, og at fólk úr Gotu heldur vildu fara til Havnar til doktara. Eg kenni ikki soleiðis fólk í hesum plássunum, tað fer at skunda fyri hr. Konoys rokuing. Um spurningin at betala læknanum helt tingmaðurin úr Gotu, at tað var merkiligt, at hinar sóknirnar ikki vóru spurdar. Hann helt hann var nøkrið betoinkiligur við, at Fuglafirðinger skuldu betala doktaran sjálvir, og og haldi eisini, at um fólk í Fuglafirði skulu vera eina um at soldja doktaran, so verður tað ein tung byrði at taka upp á seg.

Tá veðrið er gott, er tað jú lagaligt at fara úr Lorvík til Klaksvíkar og tað er tað eisini úr Fuglafirði. Men veðrið er tíverri ikki altíð gott og minni enn so, Avstandurin hjá Lorviks fólki at fara til Klaksvíkar er tann sami sum til Fuglafjarðar, men farvatnið her er so nógv betri. So hevur Lorviks bygd faltsonógv samkvem við Fuglafjørð sum við Klaksvík. Nakað annað er um stemningurin í Lorvík skuldi verið fyri heldur at sokja Klaksvíksdoktaran enn Fuglfjarðardoktaran, men tað vita vit jú einki um enn. Tá tað er sagt, at Gotumenn heldur fara til Havnar enn til Fuglafjarðar at sokja doktara, so eru góðar forumstøður fyri tí; men viss Gotumenn virkaliga meina tað, so er jú einki harvið at gera. Men við hesum tonkagangi, sum Konoy framsetur, forstandi eg ikki, hví teir ikki nú sokja til Havnar. Tað má jú falla teimum líka betr at koma av Soldarfirði ella Tvøroyri til Havnar sum nú til Klaksvíkar. Hon

haltar nakað nógv handa argumentatiónin. Og vit vita sum sagt einki um, at fólki ikki dámar tann doktaran, sum vit koma at fáa til Fuglafjarðar; tað verður vanskuligt hjá hr. Konoy at fáa eina erklering uppá tað frá kommununi.

Hr. Konoys hemmeligheitsfulla orð um, hvat sumheitsstýrilsi og doktaraforeiningin helt um henda spurning, vaktu nakrar bollinkiligheitir hjá mær. Eg standi ikki soleiðis í kontakt við hesar faktorar sum Konoy óivað gor, men er tað so, at teir eru ímóti tí, ja so hevur doktarin í Fuglafirði ikki stórar chancir. Tað er neyvan tvívl um, at sumheitsstýrilsi í foreining við doktarafelagið eru mektug nokk til at ordna tingini sum teir vilja, helst tá teir kunnu henvísa til tinguannin Konoy. Á skákinum er nokk sakarinnar skepna avgjord eins og so mangar aðrar. Hon skal goymast deils av tí grund, at fólkið har um loið ikki vil søkja doktara á tí plássinum, deils tí man ikki torir at líta Fuglafirði til at uppfylla tey forpliktilsir, tað her vildi pátikið sær. Vegurin, Konoy tosar um, er eingin grund. Tað er eingin grund til at vegurin skal gerast so vanskuligur. Man er einigur um, at Kongshavn hevur stórar moguligheitir, aldantíð nakrar moguligheitir eru í Føroyum. Man Fuglafjørður hevur eitt framum Kongshavn; tað er ein sterkt trafikerað havn. Tað er Kongshavn ikki. Vit áttu at sæð sakina soleiðis, at í oygablikkinum er brúk fyri einum doktara í Fuglafirði, møguligvís fara vit einaferð at seta ein doktara í Skálafirði — tann tíð, tann gleði! Eg vil vera líka glaður tá at arboiða fyri einum doktara í Kongshavn. Nakra erfaring hevur man jú eisini til, hvat tað betýðir við hensýn til karantenuvesin og innforilsi av sjúkum, at tann fáran kann vorða ímótigingin, viss man hevur ein sakkonan mann á plássinum. Ein sterkt trafikerað havn krevur ikki bara doktara, men eisini sjúkrahús, hvar frammandafólk kunnu leggjast inn. Henda sakin hevur tí betýdning fyri Føroyar í tað heila tikið.

R. Nielsen: Sýslumaðurin í Eysturoynni heldur, at henda sakin er avgjord sá Skákinum. Eg kann ætla, at grundin er tann, at tá hann hevði harradomi her í tinginum, dømdi hann hvørja sak á Skákinum. Men vit eru meira frísinnaðir enn so. So brixlar hann mær, at eg havi skift orðforaraskapin við tingmannin úr Gotu. Eg havi nú ikki konferera við Konoy um tað, men eg haldi ikki Andrass Samalsson máttí funnist so at, um Konoy liggur eitt orð uppí í hesi sak; tað hevur tó ikki verið so sjáldsamt at hoyra Andrass Sámalssons rost ljóðað bæði langt og breitt um bæði líkt og ólíkt, tó hann ikki er limur av viðkomandi útvalgi. Tað er tó so natúrligt, at Konoy, sum er so sterkt interesseraður í hesum spurningi, útlatar seg. Hr. Samuelsen spyr um vit kanska ikki fara at líta Fuglafirði til at uppfylla tey forpliktilsir, ið her fylgja við. Eg eri ikki kendur í Fuglafirði, men eg kenni ein mann har, og viss hann hevði fingið hetta palíknað til sín almindiliga skatt, so hugsi eg, hann hevði kunnað, tó hann gott hevði haft ráð til tað. Eftir mínari orðaring vilja Lorvíksmenn ikki sokja henda doktaran stórt; Gota veit Konoy best at doma um.

Hevði Andrass Sámalsson í 1915 viljað fylgt mær, tá eg arbeiddi fyri betri doktaraordningi í Føroyum, so var henda sak longu avgjord. Men tað er ofta so, at sjálvboðin tænasta er ofta forsmádd, og so var tá. Tá svaraði Andrass Sámalsson mær aftur hvat tramin eg vildi syrgja fyri Eysturoynni — tað skuldi hann nokk syrgja fyri. Nú kundi eg svara honum aftur: Royn teg nú sjálvur! Men eg vil ikki taka hann so illa upp, eg vil gera mítt besta her sum í øðrum. Annars haldi eg, at henda sakin nú er nakað forhastað, tað er eitt undarligt tíðspunkt, hon er framkomin á. Hr. Samuelsen hevur jú so sterkt framhildið tann stóra betýdning av at fáa motorbátar til forbetring av okkara forholdum. Teir eru jú ikki bogyntir at praktisera enn, og longu vil hann foranudra tað heila. Eg má ganga útfrá at Andrass Sámalsson ikki er fornovaður við motorbátarnar. Eg haldi tó tað er riniligari at bíða og síggja motorbátarnar praktisera fyrst. Viss tað so ikki vísir seg at svara tí forvæntningarnar, so er tíð at seta ein doktara í Fuglafirði.

Eg haldi at hinar súknirnar, tá vegurin er komin, sita líka lagaliga fyri doktaran, sjálvtum eingin er í Fuglafirði. Og ein hán má tað sigast at vera móti teimum súknunum, sum man roknar við skulu sokja henda doktaran, at tær ikki eru atspurdar. Viss tær meina at hesin doktarin eigur at koma, so skuldi eg einki haft ímóti tí.

Eg havi mína meining um tingini. Men hevði hann fylgt mær í 1915, so var sakin liðug. Nú nýtir hann ikki mína hjálp.

S. P. úr Konoy: Eg vil siga til A. Samuelsen, at vit fremja ikki sakina við at halda longri roður her. A. Samuelsen hevur eingan rætt til at siga, at hetta er ein partapolitisk sak. Sakin hevur interessu fyri nøg stór fírmuður í Gotu kommunu og búgvandi í Gotu. Eg havi ikki sagt, at

og havi mistrúgv til tey økonomisku evni í Fuglafirði. Tað má hann ikki siga. Eg havi slett ikki úttalað meg um tey politisku evnini í Fuglafirði. Tá A. Samuelsen so alvarsamt forfekter hesa sak, hví hava so ikki menn, sum hava reist sakina, spurt okkum í Gøtu og í Oyndarfirði og Leirvík? Vit hava verið við at byggja sjúkhús í Klaksvík og hava rættindi har. Men í Fuglafirði er einki sjúkhús. Vit síggja tí hetta sum eina økonomiska byrðu. Eg má fasthalda, at sum tingmaður í Eysturoy, siggi eg á hendan spurningin sum ein spurning angangandi alla sunnari helvt av Eysturoynni. Lívið hevur lært meg at man skal rokna við teimum faktorum, sum eru tilstaðar. Tað er nakað sum kallast fysikutið her og sumarheitastýrið í Keypmannahavn og hesum rokni eg við. Eg trúgvi, at hesar skipanir besita vissar kvalifikatiónir, sum gera teir førar fyri at døma í slíkum søkum. Eg vil hopa, at tingmenn fylgja mær, og og sigi tað: Lat okkum tó vera spurdar í Eysturoynni.

A. Samuelsen: Orðførarin finst at, at og havi úttalað sum resultat av forhandlingini idag, at hendan sak í motseting til hinar doktarasakirnar var fordømd á økvistinuma. Tað standi eg við enn. Tá so R. Niclasen sigir, at eg í síni tíð eisini var við til at bedøma sakir har uppi, so var tað væl so. Men tá klókir forhandlingar vóru førdir her í salinum, so kundi eg tó bent meg fyri teimum. Men tað ger orðførarin ikki í hesi sak. Tá vit bogyntu hesa sak, tá sogði orðførarin, at hann tilbjóðaði so og so í 1915, og tá skuldi tingið svara honum aftur. Nú kunnu tit siggja til at klára tykkum sjálvar sigir hann. Hetta var innihaldið av hansara síðsta fyridrag. Hann gongur út upp á at drepa hesa sak við gift, so eingin merkir tað. Hann sigur: Í 1915 stóð tað so og so, Andrass; hjalp tær nú sjálvur; nú skal hevnast; Fuglafjørður skal ikki fáa nakran doktara um eg og mínir menn ráða. Og teir ráða. R. Niclasen helt, at tað ikki var undarligt, at Konoy talaði, um hann ikki var orðførari. Tað er tó ofta, at R. Niclasen forsvinnur tá eg tali, tí redaktørurin av Tingakrossi befullar honum tað. Vit skulu betala redaktørinum av Tingakrossi fyri at sita her og halda justits yvir sjálvstýrissossunum. Tingakrossur raður. Tingakrossur skal bliva referentur her. Tað er vorðið sum gott. Soleiðis eru sjálvstýrismenn. Eg havi ikki sagt, at R. Niclasen ikki torir at svara aftur. Hann torir tað. Men tað, sum eg sogði, var, at teir spurningar eg rætti til orðforaran, teir svaraði orðforarin ikki uppá. Men tingmaðurin í Gøtu tekur sær fyri at svara uppá tað. Teir báðir skifta um. R. Niclasen meinar at hann torir ikki at standa inni fyri, at Fuglafjørður kann garantera fyri doktara. Fuglfirðingar eru ongantíð komnir so langt niður, at teir hava verið leysingarbørn í Føroyum og leysingarbørn í Danmark. Eg havi aldrinn vitað, at R. Niclasen hevur verið diktari. Men hann situr jú undir liðini á Dobess, sum eisini er diktari um enn hann er ein vánaligur diktari. — Eg vil spyrja: Meina tit ikki, at Fuglafjørður kann betala? Ella meina tit, at fólk úr Gøtu, Leirvík og Oyndarfirði ikki vil søkja doktara har. Tað er eingin grund til at spyrja um tað. R. Niclasen sigir, at nú hava tit fingið ein motorbát til Klaksvíkar doktara, og at nú kundu vit fyrst siggja hvussu tað gongur við hesum motorbátinum. Men motorbátarin er ikki anskaffaður fyri Fuglafjarðar skyld. Men motorbáturin er neyðugur fyri Klaksvíkar doktara álíkavæl; tí man kann ikki leggja koyruvegir yvir um firðirnar har. So sigir R. Niclasen, at doktari átti at setast onkurstaðnis millum Fuglafjarðar og Skálafjarðar. Skal tað vera miðskeiðis har, so má tað vera á Traðavatnaskarði. Men og havi ikki nógvan hug til at tað skal vera tað.

Til tingmannin Konoy vil eg siga nokur fá orð. Hann er svangur, siggi og, hann gongur aftur og fram, tað fer eisini at vera morgunmartatíð. (Konoy: eg havi etið morgunmat). Konoy hevir verið hálvgeistligur maður; hann formanar meg til at tala í einari róligari tónn; — eg eri altíð róligur, og eisini í hesari sak, men at hrr. Konoy skal formana meg til at tala róliga og ikki agitatorisk, tað haldi eg veru, sum maðurin segði, nakað malplacerað. Eg havi talað róliga og sakliga um hesa sak, so eg kann ikki taka ímóti nakrari ábroiðslu frá skúlalæraranum í Gøtu, sjálvt um eg hevði verið skúlabaru hansara, men eg eri tingmaður úr Eysturoy so væl sum hann og valdur við minst líka nógvum stimmum sum hann. Eg eri ikki í forstandarskapinum í Fuglafirði og havi ikki verið við til at forhandla um sakina har, so eg veit ikki, hvat har hevir verið frammi. Eg veit, hvat ið skeddi við sakina í 1902, og hvat ið fólk hava hildið um hana síðani. Eg veit ikki um hini forstandarskapini eru spurd; tað kann vera, eg kann vel hugsa mær, at man hevir spurt tey, men á einum so seinum tíðspunkti, at man ikki hevir

fingið nakað svar aftur. Men tað er ikki høvuðssakin fyri meg. Tað viktugasta fyri meg er hetta: er tað brúk fyri doktara har úti ikki? Er tað tað, so vilja vit arbeiða fyri at fáa hann, er tað ikki, so er eingin grund til at arbeiða fyri at fáa hann. Men so kann man spyrja: er tað økonomisk sikkurheit fyri, at ein doktari kann klára seg í Fuglafirði? Har siga Fuglafirðingar, at teir vilja garantera, og so mega vit undirsøkja, um teir eru tað montir; og eru teir tað, so verður tað teirra sak, um teir vilja taka byrðina uppá seg. Hvat ið sjúkhúsinum í Klakksvík viðvíkir, so verður tað jú so, at tey forpliktilsi, men í Fuglafirði hevir pátikið sær yvirfyri tí, beheldur bygdin sjálvsagt. Um vit fáa doktara í Fuglafirði hoyra vit jú stødig til Klakksvíkar doktaradistrikt, og doktarin har er stødig distriktsdoktari í Fuglafirði. Fuglfirðingar mega betala tað til sjúkhúsið í Klakksvík sum teir hava forpliktað seg til. Vit behalda tað góða, vit hava og fáa eitt annað gott aftrat, men tað kostar meir, tað má man vera klárur yvir. Táið hr. Konoy so kemur inn uppá, hvat fysikus og sunnheitsstýrisið meina, so skuldi man tríð, at Konoy helt, teir vistu vel skil á hesum; men vit kunnu jú ikki hert taka hensyn til, hvat sunnheitsstýrisið meinar í loknuskotum. Men um hr. Konoy meinar, at menn, ið sita í sunnheitsstýrilsinum, og fysikus skuldu haft betri skil á føroyskum læknaviðurskiftum enn løgtingið, so vil eg ikki undirskriva tað. Sjálvt um fysikus og sunnheitsstýrisið siga, at doktaraforholdini eru væl ordnað, og tað føroyska fólkið heldur: nei, so kann eg ikki halda við sunnheitsstýrilsinum. Sakkunnskapur er góður nokk, men vit mega ikki vera slavur av sakkunnskapinum, tí hann kann danna sær meiningar, sum hann heldur vera ófeilbarligar. Lat okkum brúka sakkunnskapin og taka sakkunnskapin í okkara tænastu, men lat ikki sakkunnskapin fara við okkum. Hvussu Fuglafjørður liggur í forhold til Lorvík og Oyndarfjørð, í ti eri og fullt so sakkomur sum sunnheitsstýrisið.

H. Nielsen: Eg má beklaga í hogan grað, at slík tala, sum tann Andrass Nielsson, sýslumaður og fólkatingsmaður, hevur hildið ídag, skal kunna tillátast á Føroya løgtingi, og ikki verða pátalað av formanninum.

A. Samuelsen: Tað er aldeilis eingin grund til at pátála tað, sum eg havi sagt. Táið Rasmus Nielsen innleitur seg uppá at tosa um, hvat ið skal vera góður tingskikkur, so gongur hann eitt fet longur enn hann er mentur. Tí er tað nakar, sum ikki er mentur at doma um tað og sum hevur vanskuligt við at fylgja góðum tingskikki, so er tað tingmaðurin úr Miðvági.

H. A. Winther: Tað er vanligt almindiliga brúkt soleiðis, at eitt spursmál ikki verður avgjort við 2. viðgerð, tá talan er um ein bevilling. Tað er kanska tillátuligt eftir forretningsordanunum, tí tað roðar um at framskunda sakina, men tað er neyvan neyðugt í hesum tilfeldinum.

Formaðurin: Da der neres Ønske om, at Sagen overgaar til 3. Behandling, vil det blive sat under Afstemning.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Kommunulækni í Vági (8.).

3. viðgerð.

Orðfarandi (R. Nielsen): Her er innkomið eitt endringsforslag síðani sakin var til 2. viðgerð. Eg skal fyrifyrst, til eg veit greidligari hvat tað er forslagsstillarin meinar, taka mær forbehald til at anbefala útvalgsins forslag.

O. Effersøe: Motiverne til Ændringsforslaget blev tilstrækkelig tilkendegivet ved 2. Behandling, saa det er ingen Grund for mig til at komme ind paa nogen Vidtløftigheder. Det har stor Betydning, at en saadan Sag fremtræder velordnet, saa at Regeringen straks er klar over, naar den ansøgte Bevilling skal gennemføres, at alt er i Orden fra Kommunernes Side. Det forekom mig, at der manglede noget om, hvorledes Udgifterne skulde fordeles mellem Kommunerne, dli naar der skal bygges en Lægebolig i Vaag, saa bliver Udgiften herfil selvfølgelig fælles for de paagældende Kommuner, og der skal da nogen til at træffe Afgørelse om, hvorledes der skal bygges. Der vil da blive at nedsætte et Udvalg fra de forskellige Kommuner. Endvidere vil det være rigtigt, at Amtmanden bemyndiges til paa Tingets Vegne at give Samtykke til, at Kommunerne paatager sig

de nodvendige Forpligtelser. Jeg skal tillade mig at læse Ændringsforslaget op.

Jeg vil saa anbefale Forslaget og haaber, at Udvalget vil indtage en forstaaende Stilling, saaledes at det imødekommer disse Ændringer, naar der ellers er al rimelig Grund dertil. Det er jo ikke magtpaaliggende for et Udvalg at holde saa uvægerlig fast paa sit Forslag uden nogen Ændring.

Orðføraríu: Eg eri ikki í iva um at útvalgið vil imøtikoma forslagsstillaranum og stemma fyri broytingaruppskotinum, sjálvtum eg ikki haldi tað vera neyðugt. Tað skaðar í hvørt fall ikki sakina og eg skal anbefala at stemma fyri tí.

S. P. úr Konoy: Henda sakin er av nakað líknandi beskaffinheit sum hin fyrra laknasakin, men hesin formurin tilfelar meg ólíka betri. Soleiðis skal ein sak fyriliggja. Eg vil tilráða at stemma fyri broytingaruppskotinum.

Nevndarálitið við broytingaruppskoti varð samtykt.

Forðan fyri flutningi av smittusjúkum til Føroya.

2. viðgerð.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Forðan fyri landfarsóttum í Føroyum.

2. viðgerð.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Tuberkulosulóg.

2. viðgerð.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Skatturin til skjútskassans.

2. viðgerð.

Orðføraríu (J. J. Thomsen) greiddi frá nevndarálitinum.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Sandvík sum serstøk sókn.

3. viðgerð.

Orðføraríu (S. P. úr Konoy) greiddi frá nevndaruppskotinum og legði aftrat at hevði tað ikki verið so seint í tingsetuni, hevði tað verið vert at taka broytingaruppskotið upp.

Th. M. Strøm greiddi frá broytingaruppskotinum.

O. Effersøe: Skønt der kunde være nogen Grund til at støtte Ændringsforslaget vil jeg dog ikke stemme for det, da det vil foraarsage, at denne Sag kommer i Langdrag og eventuelt bliver standset.

Th. M. Strøm: Tá Hvalba og Sandvík hava verið saman í langar tíðir, so hevur tað ikki so nógv at siga, um sakin støggar eitt ár aftrat. Tá sakin kemur fyri aftur vil eg anntaka, at tingmenn vilja taka í batraktning tað, sum tá kemur at fyriliggja. Eg vil mæla til, at broytingaruppskotið verður samtykt.

S. P. úr Konoy: Broytingaruppskotið gongur út uppá at upptaka tann sama tanka sum kommunala nevndin hevði ífjor. Men sakin má álíkavæl aftur til forstandarskapið. Vit meintu at markið var brúkt fyri at sakin skuldi kunna fremjast. Vit vóru ikki óbetingað tilfriðs við tað.

J. Poulsen: Det var Tanken at sætte Skellet omtrent paa Højderyggen. Om man tog hele Havgeparten med, saa maatte man dog afvige noget fra Højderyggen. Men Forstanderskabet har ikke villet akceptere det. Spørgsmaalet foreligger saaledes for Udvalget: Skal det være Udskillelse saadan som Forstanderskabet ønsker det eller skal man nøgte Udskillelse? Udvalget foreslaar Elven, som skiller tre Havgeparter fra hver-

andre. Udvalget foreslaar Deling efter denne Grænse; dog saaledes, at Forstanderskabet faar Lejlighed at udtale sig om Skatten. Naar Udvalget har gjort dette, saa er det fordi Sagen skal fremmes i Aar. Men om Medlemmet fra Sudero vil paatage sig Ansvaret for at udsætte Sagen, saa kan det ikke skade os saa meget.

N. Debess: Eg havi eisini verið í nevndini og var við ífjor at taka stilling sum liggur nær við hetta broytingaruppskotið, sum her er frammi. So sum statt er, ætli og mær tí at stemma fyri tí.

J. H. Poulsen: Man sigir, at broytingaruppskotið er omtrent tað samme som nevndin satti saman ífjor. Men er meiningin við broytingaruppskotinum ikke at markið skal vera eggin? Men om man skal kunne take ein part av haganum som liggur nøst við bygdina, skal man skera ein part burtur og siga, at tað skal høyra til Sandvíkar. Tað er eitt nýtt spursmál, vit her kasta inn. Viðvíkjandi Skopun, tá tók man ein part av nokrum høgum. Man hevur har ikki fylgt tí regli, at markið skal vera natúrligt hagamark. Tað má vera rætt at tey arnal, sum egna seg til uppdyrking koma við.

O. Efferøe: Om der skal afviges fra Markeskellet, saa maa man modtage til Sandvig to Havgar: Havgerne Syd for Elven, som grænser til Sandvig, og hvor der kan være Tale om Bebyggelse.

Jørn Poulsen: Det var netop det, der i Fjor fik Udvalget til at stille sig saaledes, at det tænkte paa de to Hauger. Jord er et Skatteobjekt, og det vil falde meget vanskeligt at faa ordnede Beskatningsforhold, naar man ikke faar hele Taksationsnummere paa hver Side af Markeskellet. Jeg kan huske, at netop dette Spørgsmaal voldte store Vanskeligheder, da Skopen skulde udskilles fra Sand.

Edv. Mortensen: Eg má vera samsintur við seinasta talara um, at tað natúrligasta er, at heilir hagapartar fylgja við. Men nú man hon vil siga: áin skal vera mark, so vil tað fáa undarligar konsekvensir. Tað er at venta, at Sandvíksmenn skjótt sota búgv sunnanfyri ánna, og so skuldu teir eftir hesum komið at skatta til Hvalbiar.

Jørn Poulsen: Naar en Del af Haugen kommer til Sandvig, og den større Part hører til Kvalbø Sogn, saa vil det medføre Vanskeligheder, da Hauge som Hauge er Skattoobjekt, og hver Hauge er taksoret som en Helhed. Det var meget vanskeligt ved Skopens Udskilling; der var flere Forslag fremme dengang om Ordning af Skatteforholdene; jeg husker ikke rigtig, hvordan det endte, men jeg synes det endte med, at en Del af Marketallet skal beskattes i Skopen. Hvis Repræsentanterne for Sudoro ikke har noget imod at Sagen udsættes til næste Aar, vil dette vistnok være det heldigste.

S. P. úr Konoy: Eg trúgvi, at husir menn í Sandvík, ið eru eitt minnital í sóknarstýrinum, koma at nógra teirra stoðu, at teir ikki krevja alla Sandvíkina. Eg haldi tí, at tað er betri, teir bíða eitt ár, og so kunnu teir kanska fáa umrátt seg til bótus í hesum máli; og kann tí stemma fyri broytingaruppskotinum.

Broytingaruppskotið varð samtykt.

Lóguppskot viðv. „Skøde og Panteregistre".

2. viðgerð.

J. H. Poulsen: Eg skal biðja fingmenn taka vel undir nevndaruppskotið.

Formaðurin: Lógarfrumvarpið hevur somu innihald sum lógin frá 16. desember 1914 og gongur út á, at tey tá fastsettu tíðarskeiðini, sum útlopa 31. desember 1919, verða longd uml 5 ár frá 1. januar 1920 til 1. januar 1925.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Útbýti av amtsfátækragrunninum.

2. viðgerð.

M. J. Winther: Tað er soleiðis viðvíkjandi, at amtsfátækragrunnurin ikki hevir stórri árliga inntøku enn so, at rentuinntøkan er 63 kr. stórri enn tær fostu útreiðslur. Fátækrabyrðin er ikki so ógvuliga tung, so tingið hevir ikki í ár hildið tað neyðugt

ut geva nýggjar útreiður av hesum grunni. Nevndaruppskotið biður tingið samtykkja at lata Mikladalssókn fáa eina studning av amtsfátækragrunninum uppá 150 kr.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Grundlógarbroyting.

3. viðgerð.

J. Paturssun: Eg skal mæla til at geva uppskoti meirihlutans atkvøðu, fyrst tí frá R. Rasmussen og mær, síðani, um tað ikki verður samtykt, tí frá E. Mortensen, og ikki geva minnilutans uppskoti atkvøðu. Eg vil aftrat bert siga nøkur fá orð, ið sipa til, hvat ið kom fram í orðadráttinum millum hrr. Effersøes og mín við 2. viðgerð av hesum máli. Táið eg tá helt fram, at hrr. Effersøe hevði verið nakað bóndskur í orðum, tá hann kom niður til Danmarkar fyrstu ferð sum fólkatingsmaður, tá avvísti hrr. Effersøe hetta sum eina skeiva frásøgn. Men eg hevði kortini góðu grund til at draga hatta fram, tí tá hrr. Effersøe í 1906 nýtti eitt eyknevni á fólkatingi um sjálvstýrismenn, tá hann nevndi teir separatistar (hann nýtti orðið í alt 13 ferðir í talu síni) tá gav hann Danum eitt skeivt bílæti av, hvat vit vildu: ikki at vit vildu okkara landi væl, men at vit vildu Danmørk ilt, og tað ikki annað enn skaðar, táið hetta mál kemur fram á danska ríkistingi. Hansara frásøgn var tá ikki væl móttikin, sjálvt um hrr. Effersøe heldur tað mótsetta. Honum var ikki heilt væl tráð í fyrstuni; tað var fyrst táið henda tala var tikin upp í saman ferð eftir ferð, at hon at endanum fór at virka. Tað framgongur av úttalilsum, ið fullu á fólkatingi, at tað vóru menn, ið ikki væl kundu trúgva hesa hr. Effersøes frásøgn. Tað var ikki fyrrenn seinri at tað var undirtikið og samtykt og hildið fyri bøint, tað sum Effersøe hevði borið fram. Og tað vil sjálvsagt ivirka illa á hesa sak, at Danskararnir í so mong úr hava fingið innprentað sínar so rangvorga fatan av, hvat tað er, sjálvstýrismonn vilja.

O. Effersøe: Paturssun hev for en Gangs Skyld udtalt sig om min Fremstilling af hans Partis Politik i Rigsdagen paa en høflig Maade. Det er dog altid et Fremskridt. Men hans Udtalelser er selvfølgelig ikke rigtige. Det er saaledes netop betegnende for mine Udtalelser i Rigsdagen, at jeg udtrykkelig understreger, at jeg mente, mine Modstandere havde gode Bevæggrunde samtidig som jeg siger, at deres Politik efter min Anskuelse vil føre til Forderv for os heroppe paa Færøerne. Paturssun viser igen til Øgenavnet »Separatistere, som jeg skal have sat paa Selvstyrepartiet. Ja, den Metode kender man. Det er den gamle Taktik fra mine Modstanderes Side at indbilde Folk, at dette Ord rummer noget saa frygteligt, det er noget af det værste, der kan siges om et Menneske. Det er en ganske bekvem Taktik; et Ord lader sig jo let udlægge paa forskellig Vis og navnlig hvor det som her er et Fremmedord, hvis Betydning var ret ukendt blandt Folk i Almindelighed. Men det er aldeles uberettiget at lægge noget slemt ind i det ganske uskyldige Ord. Og det er navnlig nu ganske latterligt at blive ved med at trække det frem; det var utvivlsomt engang et Agitationsnummer, der lod sig bruge, men nu duer det virkelig ikke noget længer. Hvor vil d'Hrr. dog hen! Er de ikke Separatister, hvad er de da? Selvfølgelig er det en overmaade hæderlig Sag, naar man blot vil være det bekendt. Hvis Selvstyrepartiet virkelig tilstræbte Skilsmisse, saa var ogsaa det en ærlig Sag. Det er jo ikke noget, man behøver at skamme sig over, at man arbejder paa Udskillelse af bestemte Landsdele, det er i sig selv ikke noget slemt. Islænderne har jo været afgjorte Adskillelsesmænd, hvad Forholdet til Danmark angaar, og det har jo hidtil gaaet rigtig godt. Det samme kunde efter Omstændighederne ogsaa være Tilfældet for Færøernes Vedkommende. Hele dette Postyr er saaledes ganske uberettiget, og naar Hr. Patursons megen Tale derom forekommer saa anstrengt kraftig, har det sin Aarsag deri, at man kun har det ene Ord at hænge Hatten paa.

Hvad selve Sagen angaar vil jeg selvfølgelig stemme for Samhandspartiets Forslag. De andre Forslag er efter min Mening blot lagt tilrette for forskellige Smagsretninger, men indeholder iøvrigt nøjagtig det samme. Her er lidt for hver Smag.

J. Paturssun: Tað hevur so ofta verið talað um hvat Effersøe hevur sagt niðri á ríksdegi í sínari tíð, so eg skal ikki gera meira burtúr. Men hann veit jú gott, at tað vit hava funnist at honum fyri, tað er ikki bara tað, at hann hevur brúkt orðið »separatistara, men yvirhøvur fyri hansara ringu útspillu av nationalum Føroyingum

og teirra starvi og fyri tann máta, hann hevur útlagt hetta orðið »separatistara og »separatismu« uppá. Tá nú hetta uppskotið kemur fram um eina sjálvstandugari stoðu fyri Føroyingar, so er tað vanskuligt, ja mest sum ógjørligt at tosa við Danskarar í vinavold um hesa spurning, so nógv ilt blóð er lagt í teir frá fi tíð, Effersoe var ríksdagsmaður.

Annans vil eg tilláta mær at biðja formannin pátala tað, sum Effersoe hevur sagt um meg: at eg *fyri eina ferðs skyld* havi verið høfligur. Hann hevur harvið skyldað meg fyri í almindiligheit at vísa óhøfligan atburð og føra óhøfliga talu her í tinginum. Verður hetta ikki átalað av formanninum, so foli eg meg bróstholdnan sum tingmann. Slíkt er ikki loyviligt í nakrari parlamentariskari forsamling. At ein annar maður her á tingi javnt og samt brúkar verri orð, leggi eg einki í.

O. Effersøe: Jeg udtalte mig om, at jeg ikke ønskede at skabe nogen skarp Diskussion om disse Spørgsmaal, da Hr. Patursson dennegang havde været høflig i sine Udtalelser om mig. Det har han nemlig ikke altid været. I en anden Diskussion om det samme Emne var han det mildelst talt ikke. Men jeg vil nødig komme ind herpaa ved denne Lejlighed.

I sin første Tale vilde Patursson godtgøre, at jeg havde mødt Modstand møde i Rigsdagen. Det kan jeg ikke erkende. Justitsminister Alberti udtalte sig om min første Rigsdagstale smukt og anerkendende og lagde ikke Skjul paa, at han satte Pris paa, hvad jeg havde sagt. Det var noget ganske andet, da han udtalte sig om Hr. Paturssons bekendte »Tilbud«; da sagde han, at saaledes som han havde opfattet Paturssons Udtalelser, havde denne ikke tilsigtet noget slemt dermed. Det var en meget betinget Anerkendelse.

Iøvrigt forundrer det mig højlig, at Hr. Patursson ved denne Lejlighed vil give det Udseende af, at jeg har været agressiv mod ham.

Formaðurin: Fyri sanvidt Hr. Effersøe har sigtet Hr. Patursson for ved andre Lejligheder at have været uhøflig, pantaler jeg det.

O. Effersøe: Jeg vil med Hensyn til dette Spørgsmaal tillade mig at fremdrage, og det kan iøvrigt oplyses af Lagtingstidenden for 1918, at Hr. Patursson i den ekstraordinære Samling da fremsatte Sigtelser mod mig af grov Natur uden at have noget som helst at bygge paa.

Formaðurin: Spørgsmaalet om Medlemmernes Høflighed overfor hinanden maa afsluttes.

Sakin fór til atkvøðu.

Uppskotið frá Patursson og K. Rasmussen fall.

A. Samuelsen: Viðvíkjandi tí at uppskotið frá tí størra fleirtalinum í nevndini er burturfallið, so er vøl eisini hitt uppskotið fallið.

Formaðurin: Det andet Punkt kan ikke være bortfaldet, da det er mindre vidtgaaende end det første. Herom kan der ikke være Diskussion.

Uppskotið frá Mortensen varð samtykt.

Hospitalsmálið.

2. viðgerð.

Ordføraren (H. C. W. Tórgarð) greiddi frá nevndarálitinum.

R. Niclasen: Eg havi stuðjað sakina í síðstu tingsamkomu, tí eg haldi, at tað er hent at fáa eitt gott sjúkrús. Men eg stemmi ikki fyri sakini uttan undir tí forútseting, at Havnin vil vera við og vil lata studning. Nevndin hevur fort forhandlingar við Havnar býráð, men er ikki komin til nakað resultat. Og tá Havnar býráð tekur sakina so lætt og hospitalið kemur at kosta 3 ferðir so nógv sum fyrisligið, so kann eg ikki stemma fyri hesum.

H. C. W. Tórgarð: Eg haldi ikki, at nakar skal siga, at Havnin ikki hevur vist vælvild. Vit hava uppfort Havnini til at lata 15,000 kr. Viðvíkjandi drift og leiðilsi av hospitalinum er Havnar býráð villigt at forhandla.

H. A. Winther: Vit kunnu ikki skjóta hendan spurning út í tað óhasta. Eg eri við sakini, men ikki fí, at okkara økonomisku viðurskiftir eru so góð. Eg má frammhalda, at tað er óhóskugt, at vit

altíð skulu hækka skattin til amtsroparbitiónsfondin. Sakin hevði stillað seg annar leiðis, um vit nú hevdu skattalógina, sum sjálvstýrismenn settu framm uppskot um ífjor. Tað hevði verið best um hospitalið var ein sjálveigandi institusjón. Eg haldi, at Havnar byráð má vera ímøtikomandi í hesi sak. Eg kann ikki lugsa mær annað. Hospitalið skal jú liggja her í Havn. Og um hendan sakin folkur, so má Havnin sjálv fáa sær sjúkhús. Tað er sagt, at um vit avgera hendan spurningin, áðrenn Havnar kommuna gevur tilsagn, so fáa vit ongan studning frá henni. Men eg trúgvi ikki, at mann skal hava heteinkiligheitir at Havnar býráð vil bera seg so at, at tað vil fáa okkum í folluna; at vit skulu seta sakina í gongd og Havnar býráð skal so sleppa frá. — Um viðurskiftini eru ring til at lata pening, so haldi eg tó ikki, at vit kunnu bliva við at lata spurningin óloyst-an. Antin mugu vit fremja hesa sakina ella so uppheva amtshospitalið og so lata Havnar kommunu sjálva byggja sjúkhús. Tí hetta kann ikki uppihaldast sum hospital við tí standi sum har er. Vit kunnu ikki halda hatta amtssjúkrahús enn í mong ár í tí standi, tað er. Vit kunnu geva uppat at hava amtssjúkrahús, og so verður Havnar kommuna at gera eitt kommunalt sjúkrahús. Gera vit ikki tað, noga vit útføra henda plan og byggja eitt amts-sjúkrahús so stórt og tíðarsvarandi sum tað krevst. Vit kunnu ikki taka ókkum uppá størri peningaligar byrðir enn her er ætlað, 150,000 kr. Hetta verður so okkara ríkishospítal, um og so má siga við einum samanburði, ið ikki er heilt beinur, og táið vit fara undir eitt sovorðið sjúkrahús, so vilja vit gera tað so gott sum moguligt. Táið vit nú hava biðið kommmunurnar givið studning til hetta sjúkrahús, eru vit ikki farnir út um Havnar og Vestmannar distrikt, men kortini koma allar kommunur í Føroyum at taka terra, um enn minni part, táið løgtingsins útreisla verður líknað til amtsroparbitiónsfondin. Táið vit nú siga, at løgtingið gevur so og so stóran studning, kommunurnar so og so stóran, verður so eitt undirskot, kemur statskassin at betala restina; hatta er ikki ordnað og liggur nakað óklárt um, so leingi vit ikki hava fingið heinan vegin úttalilsi harum frá stattinum. Eg hopi, vit fáa sakina soleiðis ígjøgnum, at tað verður ein almindilig tilsluttning til sakina. Tað er eitt sindur koðiligt, at vit ikki hava fingið studning frá Vestmannar kommunu og Biggjarkommunu, og betingaðan studning frá Kvívik og Hvalvík. Um hetta verður eitt við-varandi noktilsi, verður her eitt hol, ið má fyllast á annan hátt, men tað liggur jú ikki fyri beint nú.

A. Samuelsen: Tað viktugasta punkt av hesum spurningi er tað undir punkt 6, andragandið til bovillingsmyndigheitirnar um eitt ógvuliga stórt tilskot. Í fjor hopaðu vit at sleppa við 150,000 kr., nú noga vit multiplicera við 3 og kanska vit koma at multiplicera oftari áðrenn tann tíð kemur, táið vit skulu fara at byggja. Tað kostar so nógv at byggja nú, men tað kann jú vera, at tað er eitt press á okkum nú, so vit noga byggja; tað meina autoritetarnir. Mín avstemning um hetta vil vera fult yvirensteinmandi við mína støðu í teirri sak, vit beint nú hevdu til avgerðar, men R. Nielsen og hinir, ið stemmaðu sum hann, teir koma at hava eina undarliga støðu, tá teir koma og biðja statin um so stóran studning beint aftaná at teir hava kraft okkara statsrættarliga forhold til Danmark upployst. Eg má siga fyri meg, at bert út frá tí forútseting, at vit behalda okkara núverandi statsrættarligu støðu kann eg stemma fyri hesum uppskoti.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Sola av prestagarðsjørðini.

2. viðgerð.

J. H. Poulsen greiddi frá nevndarálitinum og meldi til at tala um hvørja grein í uppskotinum fyri seg.

O. Effersøe: Jeg er enig med Ordføreren med Hensyn til Princippet i Forslaget, idet jeg mener, at det er rigtigt at faa en Løsning af Spørgsmaalet i den Retning. Efter at Ordføreren har udtalt, at vi burde behandle Sagen paragrafvis og ikke gøre den færdig i Aar, har jeg ikke stort mere at sige; jeg mener nemlig ogsaa, at vi bør ikke gøre Sagen færdig i Aar, da det er en saa stor Sag, at den maa overvejes meget grundigt.

J. H. Poulsen: Eg meinti, at vit áttu at tala um hvørja paragraf fyri seg, men eg meinti eisini, at vit kunnu gera sakina liðna í ár. Tað verður tíð til at hugsa um sakina til 3. viðgerðar.

O. Effersøe: Saa har jeg misforstaaet Ordføreren, jeg fik det Indtryk, at han ikke mente, at Sagen burde løses endelig i Aar. Vi har ellers brugt den Fremgangsmaade, at behandle Sagerne paragrafvis, naar vi ikke har kunnet faa et Lovforslag færdigt til Afgørelse i den indeværende Tingsamling. Jeg maa sætte mig imod at dette Forslag bliver gjort færdigt fra Lagtinget, saa sent som det er fremkommet. Landbokommissionen har bygget paa helt andre Principper end dem, Udvalget her er slaaet ind paa. Det er noget nyt, og Lovforslaget er ændret derefter. Det er umuligt, naar saa mange Sager kommer ind paa et saa sent Tidspunkt at samle den fornødne Opmærksomhed om et saa indgribende Lovforslag som dette. Jeg havde kun tænkt mig, at Sagen var bleven indbragt for at Udvalget kunde afgive en Beretning om den. Spørgsmaalet om Hegn- og Markfred har ikke faaet nogen indgaaende Behandling, men det er alligevel godt, at det er fremkommet. Jeg mener, at vi skal gøre den Sag færdig, saaledes at vi kan sige, naar Arbejdet foreligger færdigt fra vor Haand, at det er valgjort. At fremme Sagen paa dens nuværende Stadie kan jeg ikke være med til. Iøvrigt er jeg overbevist om, at det ikke vil føre til noget.

J. H. Poulsen: Ég skal bara nevna: høvuðsparagrafin er avfatað av hr. Effersøe. Annars er forslagið komið fram uppá mína rokning; eg sá nemliga ongan annan útveg at fáa sakina framda. Hvat tí angongur, at hetta er so seint framkomið, so skal eg minna um, at her eru tvey ognir forslog til lóg innkomin ídag. Ég heldi at vit kunna gjøgnumarbeiða forslagið paragrafvís, so fáa vit tá at síggja hvat vit gera við tað.

O. Effersøe: Der er ganske rigtig to Forslag til Lov indkomne i Dag, men det ene af disse er saa lut overskueligt, at det ingen Vanskeligheder volder, mens det andet frembyder en Del Vanskeligheder. Det skal derfor ikke undre mig, om d'Hrr. siger, at de ikke mener at burde fremme det i Aar. De to Forslag har iøvrigt været færdige fra min Haand for længe siden.

S. P. úr Kongi: Ég havi verið við til at seta fram broytingaruppskot til lógaruppskotið. Vit halda eins og hinir, at sakin er týdningarmikil, men við at lesa hetta uppskot havu vit rakt við ynskt sum okkum ikki dámar. Har er t. d. tað, at einans prestagarðarnir verða útboðnir til sølu. Hví bara teir? Tað eru jú aðrir garðar eisini, sum útreiða lon til embætismenn, og tað tykist okkum tí natúrligt, at teir koma til viðgerðar um somu tíð. Tá teir kirkjuligu embætismenninir skulu av við teirra garðar, hví skulu so ikki eisini teir juridisku embætismenninir av við teirra? Tað er gott, at nakað nógv av jørðini verður forbehildið kommununum, men vit halda ikki tað er nóg nógv; markið er sett ov opið fyri privat sølu av jørð. Tað er nakað, vit mugu vera álmindiliga varnir við at lata jørðina ganga sum handilsvara í hendurnar á teimum, sum hava mestan pening. Við at fylgja teim broytingum, vit hava gjørt, verður meira hensýn tikið til hetta punktið. Høvuðsformálið við okkara broytingaruppskoti er altso, at vit ikki bara lata prestagarðsjørðina til sølu, men eisini hina embætisjørðina og at jørð ikki so lættliga kann gerast privatogn sum lógaruppskotið tilsteðar.

A. Samuelsen: Tað er kanska ein stórur partur av tinginum einigur við útvalginum, men eg má siga, at eg havi ikki kunnað fylgst við tí partinum. Ég var í sínari tíð við í útvalgi angangandi hesi sak og har behandlaði eg hana, á tí grundarlagi sum goldið hevur fyri landbokommissiónini, saman við monnum sum deils hevdu ans fyri landbrúki og deils vóru talsmenn fyri kirkjuligar interess r. Nú fár hevur útvalgið forlátið høvuðsgrundarlagið. Ég eri ikki so knappur í vendingini sum aðrir og tori tí ikki vera við til tað nýggja, her er fyrisligið. Sjálvsagt sá eisini eg fegin at tað kom skil á hesum spursmáli og at tað bæði skjótt og brátt kom til ein góðan enda, men eg kann ikki vera við til at fremja eitt uppskot, sum so fullstøndiliga forletur tey princippir, vit hegartil hava fylgt. Eisini má eg siga sum sýslumaður Effersøe, at sakin er ovlítið begrundað, og nú er ovseint at fara og arbeiða uppá hana. Tann arbeiðsplan, vit hevdu, hava vit ikki fylgt; soleiðis atlaðu vit at tilkalla próstin, men tað hevur ongantíð borið til. Tað skuldi vera nakrso rímiligt, at vit nú eisini forhandlaðu við próstin eins og vit gjordu í 1913. Nú kann tað gott vera, at próstin ikki gott kann siga nakað í hesum spursmáli, men tað fyrikemur mær at tað er ratt at gava próstinum leyligheit til at úttala seg. Ég kundi hatt lyst til at konferera við próstin um hetta. Tað eru eisini ymsir aðrir spurningar, sum eg ikki eri sikkur í um teir

eru tilstrekkiligа væl varðveittir, t. d. viðvíkjandi tráðarmonnum, sum sita á prestagóðsinum og øðrum; teirra skillingur fyrikemur mær nakað óvissur. Hvørtíðspara-graffina havi eg heldur ikki kunnað til-treða. I heila tikið fyrikemur hetta so løgið at koma við motiveringunum aftaná forslagið er framsett; tað er nakað extra-ordinært. Eftir forrættningsordanum skal eitt útvalg avgeva betænkning fyrst; hetta hevur ikki kunnað tonkst fyrr, at man fransetur forslag, áðrenn betænkningur er frankomin. Man kann siga, at eitt for-slag yvir eitt gamalt forslag er ein betænk-ningur; men formelt kann man tó ikki siga tað, um tað var komið motiverað forslag til forslag frá landbokommissiónini. Hvussu langt vit eru komnir út í tingsetuna, tað veit eg ikki. Tingið bestemmar tað sjálvt. Men so kemur tað tíðspunkt, tá amt-maðurin skal bestemma tað saman við tinginum. Um vit hava langa tíð eftir, so kunnu vit behandla hesa sak. Men um vit skulu enda samlingina í annað kvøld, so er eingin vón um at gera hesa sak liðuga. Tað er rætt at vit, tá tíðin líður so nógv út, broyta eitt sindur í tingsins forrøt-ningsordan. Men her má tó altið vísast skjønsomheit. Tingið kann ikki vera bekent við at basta sakirnar igjøgnum, so tað skal kunna sigast, at vit jaska arbeiðið. Tað sost viðvíkjandi hesi sak, at nakrir ting-menn koma framm við nýum spurningum. Tað er líka so berættigað at koma framm við spurninginum um at selja embætis-gerðarnar sum prestagarðarnar. Annars skal eg minna á tá vit einaferð hovdu prestagarðsalgið til behandling her í tingi-num. Tá livdi Evensen. Hann framhar tá nógvar grundir fnóti at selja prestagarðarnar frá embætunum. Eg var ikki tá einigur við Evensen, og eri tað ikki enn. Men tann tíð, sum farin er, hevur forlikt mng nógv meir við Evensens sýnspunkt enn og var tá. Tann tíðin, sum er farin, má sigast at hava givið Evenson botýðiliga rætt. Eg vil spyrja: Er tað rætt at selja prosta-garðarnar? Um spurningurin er tann, at vit skulu selja vissar rættigheitir, sum hoyra til prestagarðarnar, so vil og siga ja, tí tað krevst nógva staðnis. Men tað er ein spurningur um vit handla í virkiliga samfunds ond við at selja prestagarðarnar frá embætunum. Vit eiga einaferð enn at yvirvoya tey argumentir, sum Evenson framførdi. Tað hava vit ikki gjort íðr, og tað er kanske av tí, at nevndin ikki ivast í, at prestagarðarnir eiga at seljast.

R. Rasmussen: Eg havi tikið eina aðra stoðu innanfyri nevndina, sum hevur havt hetta mál til viðgerð. Nú hava tingmenn utanfyri nevndina sett framm eitt broytingaruppskot, hvar teir hava tikið mítt uppskot upp sum miðpunkt, og hava teir hartil knýtt aftrat nakað sum og eisini havi havt í huga viðvíkjandi sølu av teimum gerðum, sum eru tillagdir embætis-monnum her á landi. Teir hava uppbikið tað uppskot til eina paragraff, sum eg hevði og broytt hana í ein rætning, sum mær dámar væl. Og tí havi eg undirskrivað hetta broytingaruppskotið eisini. Eg skal áðrenn eg eftirtali tey einkultu punktir svara A. Samuelsen aftur, tá hann í síni røðu sigir, at uppsitarans viðurskiftir ikki eru nóg væl varðveidd. Eg kann ganga út frá, at A. Samuelsen ikki hevur lisið broy-tingaruppskotið § 13, tí um hann hevði gjørt tað, hevði hann ikki sagt hetta, tí her er týðiliga tikið til máls fyri at veita uppsitarunum allan rætt, sum mann við góðum líkindum kann forlanga. Teir skulu hava fyrsta rætt til tað jarðastykki, teir hava havt til teirra livubreyð. Og hervið hevur man tikið alt hensýn til teirra — eisini til teirra sum hava leigutráðir, at teir hava fyrsta rætt um trøðin er minni enn eitt sumarvetrarfóður. Um sjálvt broy-tingaruppskotið skal eg siga, at tann sær-stoðan sum eg havi innanfyri nevndina gekk út uppá at imfora fastan tvang fyri grunl-eigarar av prestagørðum, hvor tað so var, og at kommunan her kundi forbehalda sær ein part av jørðini til ymiskt brúk og síðani vera pliktað at festa jørðina út eftir føstum reglum, sum galda fyri kongs-góðsið. Hetta er tikið upp í broytingar-uppskotið, men tað er her farið eitt sindur longur út í øsinar viðvíkjandi tí, sum viðrorir atgongd til sølu til privatar menn. Tað er serliga á okkara dogum ógviliga ivasamt hvussu vítt tað er rætt at lata privatmonnum fáa nakað av jørð undir teirra hendur sum ogn. Tað eru so mong ting, sum prógva, at tað vildi vera betri um hitt almenna átti alla grund ella jørð. Men tað er ikki so gott at bróta yvir tvørt við eina gamla tradisjón. Tí hava vit hildu eina lítla hurð opna hvar privatmenn kundu fáa keypsrætt til smærri pettir. Hesum viðvíkjandi stendur tað at tað kunnu ikki seljast størri stykkir til privatmenn enn 1 dekar — 1000 kv. metrar - - í vídd, og hetta skal ske undir kontroll frá tí almenna, frá amtmannínum og tveimum av tingsins valdu monnum. Tað kann hugsast at

privatmenn kundu fingið sær nok so nógva jørð, tá teir kundu fingið keypt ein dekar ísenn og so samla tað saman seinni. Men tað kann ikki ske, tá tað almenna passar uppá. Broytingaruppskotið gongur út uppá at behalda 1. og 2. stykki í § 8. Tað verða stillað tey betingilsir at hvor dekar verður bundin til ikki at seljast aftur utan við vissum treytum. Í broytingaruppskotinum er eisini syrgt fyri, at hvør kommuna, sum fær ein slíkan eigindóm, kann sikra sær vissar partar av bønum — upp til ein fimtapart av bonum. Harnæst kann kommunan fáa búksrætt yvir tann part av hagunum, ið landvesenskommissiónin heldur vera tjenligur til byggingar av húsum ella til industriella drift, serliga torvheiðar, sum kunnu leigast burtur. Hær kann kommunan eisini selja 1 dek. til einstakan mann, men ikki meir. — Alt hvat ið útyvir hetta er, skuhi kommununar leiga út, festa út til menn eftir teim reglum, ið galda fyri kongsjørð. Festið skal deils kunna vera av bø aleina, haga aleina, ella bæði bø og haga. Av utangarðs skal kunna festast frá 1 kúfoðri upp í 8 kúfóður (summar og vetur). Innangarðs er 1 kúfóður sett sum mark. Fyri at imøtukoma teim monnum, ið hava sitið við heilt lítlari jørð av presta gørdunum, so líkið at teir hava vant seg til at rokna við tí sum ein partur av teirra inntøku, so skulu hesir menn, ið hava sitið við upp í 1 mørk sum uppsitarar, hava frammihjárætt til at festa hesa jørð frá kommununni. Festast bæði utangarðs og innangarðs ísenn, kann festast frá 2 mørkum upp í 8. Markið er sett upp í 8 merkur, við tað at ymsir prestagarðar liggja soleiðis fyri, at tað ikki ber væl til at stykkja smærri studur. Í Syðradali eru t. d. 16 merkur. Tað er ov nógv fyri ein mann, men gevur 2 monnum gott lívsbreyð. Tað sama er í Norðadali, har er kortini bygd, men við tað at eisini har verða menn vístir til næstan bert at lívа av, hvat jørðin gevur, mega festini ikki gerast ov lítil. Ég havi roynt at greiða frá hvussu meirihtaus uppskot vil virka við hesum broytingum. Eg haldi, at sakin er so væl gjøgnumarbeidd, at hon væl kann gerast liðug í ár. Táið menn her hava hildið, at sakin ikki eigur at gerast liðug í ár, má tað vera út frá einum øðrum sjónarmiði, enn vit hava haft. Táið embætisgarðarnir eru tiknir inn undir hetta uppskot, so er tað tí teir ikki eru vorðnir útnyttaðir so væl sum teir eiga. Men táið ein maður situr við jørð á so leysum korum sum uppsitararnir á embætisgørðunum, so er ikki væntandi, at hann skal gera stórar grundhotingar. Bert tá hann hevir vissu fyri, at hann kann hava jørðina so leingi hann livir og born hans hava frammihjárætt til at festa eftir hann um tey vilja, vil hann hava tann ratta hug til at fáast við jørðina. Hetta er eins fyri embætisgerðarnar og prestagarðarnar, at teir til ein vissan grad hava ligið í vanrokt av hesum grundum. Vit hava loyvt okkum at fyrisláa ymsar smáar broytingar til kommissiónsátkastið, t. d. viðvíkjandi byggningunum, hvussu teir skulu fylgja við. Prestagarðshúsini fylgja sjálvandi presti, men hvar tað eru uppsitarahús, ið hoyra til festið, har vilja tey koma at fylgja við til tann nýggja festaran. Vit skjóta upp, at peningurin, ið komur inn við sølu av embætisgørdunum skal leggjast í ein serligan grunn, ið skal ráðast yvir av logtingi. Vit meina, at jørðina í Føroyum, kongsjørðina og embætisjørðina, hana eiga vit, og táið staturin hevir haft hana so leingi, so eigir hann bert at siga takk til og eigir at geva okkum hana aftur, táið vit biðja um hana. Undir eitt at siga er ikki stórur munur á teimum, ið hava framsett uppskot her; tað mest umráðandi er tað, at broytingaruppskotið so mikið sum møguligt ynskir at minka um sølu til einstakan mann. Høvuðsuppskotið loyvir at selja leigutræðir til tann mann, ið hevir dyrka hana: »Lejetrøer kan selges til den, som har opdyrket dem, eller som maa siges at være indtraadt i Opdyrkerens Rettigheder. Ellers maa Salg af Indmark kun ske til Byggegrund, formodne Veje, Havestykker, Fiskeetterings-pladser og lignende«. — Eftir miuniteluppskotinum skal ikki kunna seljast meira enn 1 dek. til einstakan mann uðan at amtið loyvir tað saman við tveimum av logtingi valdum monnum. Tað er tann sama begrunsningin sum hjá toimum, ið stillað hava broytingaruppskotið; her er bara tann munur, at teir als ikki tilstoða sølu av størri stykki enn 1 dekar til sama mann, og so hava teir tikið hinar embætisgørðarnar innundir sølugið. Her eru sjálvandi ymiskar meiningar um, men hví skulu hesir skiftandi embætismenn, sum koma og fara eins og flytifuglar, hava Føroya jørð undir sær, meðan Føroyingar sjálvir sita uppá leys vilkor á teirra gørðum. Tað er eingin meining í. Her eigur alt at gerast sum gerast kann til at fáa meira útbýti av hesi jørð enn tað, ið nú fæst av henni.

J. H. Poulsen: Aftaná tey úttalilsir, sum frambornin eru, havi eg ikki stórar vónir um at fúa lógarforslagið igjegnum,

Betraktningarnar eru nógso ymiskar. Seinasti talari kom inná tær framsettu endringarnar til tær forskelligu §'ir, men tað er nú ikki so lætt at yvirskoða. Munurin millum okkara forslag § 8 og tað, Rasmus Rasmussen fyrisær ístaðinfyri, og endringarnar til tað, er stórur. Eg kann ikki teinkja mær at ganga við til Rasm. Rasmussens forslag um tvungnan útfestning, hvis kommunan yvirtekur prestagóðsið. Kommunurnar mugu behalda hagarnar; her forslær ikki tað forbehald, R. Rasmussen hevur tikið í sínum § 9. Siga vit, at garðarnir skulu festast útaftur alt fyri eitt, so er tað líkagott at fastslá í lógini, at prestagóðsið verður yvirdrigið í festi til forskelligar menn, tó at kommunan kann forlanga brúksrætt. Fær kommunan eigindómin til keyps, eri og ikki stentur fyri, at hann verður útfestur beinanvegin.

Í broytingaruppskotinum eru hinir embætisgarðarnir tiknir inumundir lógina. Teir eru ikki so nógvir til, Hoyvíksgarð fáa vit væl til landbúskúla. Hetta vil gera sakina meira kompliceraða.

J. M. Matras: Tíverri er sakin komin so seint fram og í so fáum avskriftum, at tað er ringt at fáa eitt yvirblikk; tað átti at verið ein avskrift til hvønn tingmann, so man kundi samanhalda forslagið og endringarnar við hvørt annað. Tað hevur verið mær so vanskuligt at fáa fatur í nakað av hesum forslogum, at eg ikki havi fingið lisið tey gjølla. Tað stóra princippið er væl antin man skal selja prestagóðsið til smærri brúk ella behalda tað samlað. Tað kann hava sínar fordeilir at behalda tað sum eitt samlað heila í eini bygd, tað kann navnliga vera heldugt fyri tann óbemidlaða mannin, at tað er eitt samlað brúk.

Annars frykti eg fyri at hetta verður eitt kors fyri kommunurnar at skula stíla fyri hesum, tað verður vanskuligt at gera tað til almindiliga tilfriðsheit. Skal resultatið blíva tað, at hann ið mestar pengar hevur, kemur at fáa jørðina, so er tað ikki rætt. Tað er heldigt, um smámenn kundi blíva við sum nú at vera uppsitarar. Har norði hjá okkum hevur mann tradir til leigu av prestagarðinum. Tað kundi vera heldugt, um teir fingu hesar tradir til eigindóm. Kommunan skuldi keypt allar torvrættigheitir, sum eru í prestagarðinum har, til bestar fyri bygdamonninar. Viðvíkjandi dyrking av jørð til nýar traðarmenn, so átti øll tann jørð sum egnar seg til uppdyrking, at blíva lagt fyri seg. Hetta skuldi kommunan útstykkja í kúfóður og helst latið tað til eigindóm, tí tað dámar mongum best. Eg vil fráráða almindiligt sulg til kommununa. Men hesi einkultu punktir halda eg tó vera fordeilaktig. Tá vit skulu til at behandla hetta paragrafvís og um tað verður samtykt, so nýtast væl broytingar til tað. Men nú hevur mann so stutta tíð til at lugsa seg um. Eg havi lisið hesi uppskot frá landbólógini, men mann hevur tað ikki alt so gott í hovdinum, at man kann minnast tað so gjølla.

Prósturin: Tað er stórur og týdningarmikil spurningur, sum her ídag liggur frammi á Føroya løgtingi. Hendan sak kann fáa ógviliga umfatandi týdning á mangan hátt; tí her er einki talan um at broyta nakað, sum er gamalt her á landi. Her er talan um at skilja prestaembætini frá teim gerðum, sum í mong hundrað ár hava ligið aftrat teimum. Tað er tí rímiligt, at man lugsar seg væl um í hesum máli. Fíra hovuðspurningurin er tann, um tað er beint at selja ella beint ikki at selja. Tað kann vera nógv, sum talar fyri at selja og nógv sum talar ímóti. Nógv sum talar fyri — millum annað tað, at prestarnir ikki kunnu haldast at vera dugandi menn til at starvast við jarðabrúk og at tað veldir teimum stríð og tarna at fáast við garðarnar, meðan tað kann lugsast at vera til vinning fyri landið í síni heild at aðrir menn, sum eru jarðabrúkarar, fáa hetta góðsið. Á hendan hátt vildi mann fáa meiri burtur úr jørðini. Hetta og annað talar fyri at selja jørðina. Og tað tykist sum tað er trongd til at fáa jørð til uppdyrking her á landi. Men tað kann eisini vera nógv, sum talar ímóti. Og her er fyrst og fremst: Um tað ikki kann bliva til aftangongd og tap fyri prestaembatini, um tey skilja seg av við jørðina. Ístaðinfyri skulu tey hava viðurlag í peningi. Men pengar og jørð er hvørt sítt. Peningar kunnu vera álitugvir og kunnu minka í virði. Men jørð vil oftast vaksa í virði. Tað kann soleiðis koma at vera ein missur fyri prestaembatini. Man kann væl siga, at prestarnir í Føroyum sita oðrvísi fyri nú enn fyrr; men her er tó nakað sum eigur at lugsast um. Eg skal ikki steðga ímóti at prestagarðarnir vera seldir, bert eg kann vera vissur í at tað ikki verður prestaembættinum at skaða og at tað verður landinum til gagns. Hetta má vera hovuðsakin. Tað er beint, at eg havi sagt, at prestarnir ikki hava havt líkindi at samráðast við nevndina, sum hevur við hesa sak at gera. Eg havi av og á talað við menn, sum eru í nevndini, um

ein og annan spurning, men um eg var komin til samráðar við nevndini, veit eg ikki, um tað kundi fört til sameining. Men er tað ikki heint, áðrenn sakin verður avgjørd at spyrja prestarnar. Eg havi verið spurdur fyrsta ferð, hendan sakin var til viðgerðar her. Eg eri sjálvur biðin um eitt slíkt ummæli. Og tað var í tí tíð, at Evensen bar framm sínar grundir, sum talaði ímóti, at garðarnir skuldu seljast. Prestarnir hava havt sínar orfaringar og tað kundi tá vera rímiligt, at teir vóru spurdir. Her eru nógvir einstakir spurningar, sum mugu takast upp. Men eg skal ikki nú nema við teir. Mær tykir at sakin liggur so fyri her ídag, og at tað er so stórur ójavni á meiningunum, at tað er ivasamt, um sakin eigur at førast framum. Tað ræður ikki um at fáa sakina ígjøgnum fár, men fáa hana soleiðis ígjøgnum, at úrslitið verður gott og gagniligt fyri okkara land. Undir hvørjum formi tað skal seljast skal og einki serligt siga um utan tað, at eftir míni meining má løgtingið gera, hvat tað kann fyri at hendan jørð eisini í framtíðini verður landsins ogn, so hon ikki kemur á privatar hendur til endan. Tí hevði eg hildið at tað var tað ratta at hon bleiv fest ístaðinfyri seld. Umframt prestagarðarnar eru eisini anneksgarðarnir. Teir hava serstøðu. Teir eru givnir til embætini við serligum kgl. gávubrævi. Um prestagarðarnir verða seldir so mugu hesir fara við. Og tá prestagarðarnir fara so mugu hinir embætisgarðarnir eisini fara á sonn tíð og á sama hátt.

A. Samuelsen: Tá R. Rasmussen sigir, at eg nokk havi sæð tey bestemmilsir sum hann sipaði til, so hevur tað ikki verið hett fyri tingmenninar at seta seg inn í hetta. Tí í korta tíð vóru tær fostu avskriftir farnar. Eg havi ikki kunnað fingið fatur í nakað eksemplar av teimum. Eg haldi ikki, at uppsitararnir hava fingið so góðan stilling sum teir áttu, heldur ikki, at teir húsmenn, ið hava dyrkað teirra trøð, fáa góð vilkor. Eg hurtaði eftir R. Rasmussen, men var sakin flokt áðrenn, so er hon ikki minni flokt av hansara broytingar uppskoti. Har komu prinsippspursmál fram, og um tey skulu gjøgnumførast, so fáa vit onga lóg ígjøgnum, sjálvt um vit viðtaka hana her í ár. Vaul eri eg samsintur við R. Rasmussen um, at vit eiga fútagarðin og hinar embætisgarðarnar, men vit kunnu ikki siga annað enn at staturin eigir oin stórran part; tað er jú nøkur sum statsborgarar, at vit eiga okkara part. Eisini um festigóðsið er tað ein spurningur, hvør ið eigur tað, skal tann spurningur reisast nú, so kviði eg fyri, at hendu sak ikki loysist í nánd. Eg siggi ikki uppá hetta sum R. Rasmussen, at vit eiga festigarðarnar í mótsetning til prestagarðarnar; eg haldi at eigindómsforholdini eru tey somu í báðum tilfellum. — Próstarin úttalaði seg her á tingi um hesa sak; hann úttalaði seg nakað diplomatisk, eg veit ikki rættuliga, um hann vil selja ella ikki. Hann segði, hann vildi selja, um man vildi gagna landinum, men bert uppá tann máta. Tað eru jú vísdómsorð. Men tað er jú notupp tað vit skulu hava avgjørt her, hvat ið gagnar landinum best. Vit vilja allir gera tað gagnligasta, men vit kunnu vera í iva um, hvat ið er tað gagnligasta, og táið so ur plagar nøn at bíða og lata alt vera sum tað er; vit eru jú allir í virkuligheitini ógvuliga konservativir, so tað verður væl tað rættasta at bíða og síggja, hvussu hetta skal loysast uppá tann besta máta. Eg havi ongan rætt til at vísa á, hvussu sakin skal behandlast, vit hava nú diskuterað sakina í almindiligheit, men eg haldi ikki, at vit nú skulu koma inn uppá einkultheitir.

R. Rasmussen: Eg skal loyva mær at framseta ein spurning til A. Samuelsen. Hann talar um ta støðu tráðarmenn og uppsitarar hava, at teir ikki eru nóg tryggjaðir eftir hesum lógaruppskoti. Eg vil tí spyrja tingmannin úr Suðuroy, um hann vil siga okkum, undir hvørjum korum hann meinar, at tráðarmenn og uppsitarar eiga at liva, so vit kunnu vita, hvat hann finnust at í uppskotinum. Eg haldi tað ikki vera neyðugt at stoðga sakini, og eg vil gjarna síggja hana framda.

A. Samuelsen: R. Rasmusson spurdi meg, hvat stilling eg ætlaði teim tráðarmonnum og uppsitarum, ið sita við jørð av prestagørðunum. Ja, tað er jú notupp tað, eg havi roynt at gera R. Rasmussen begripiligt, at eg ikki eri lidugur við míni yvirvejilsir um hetta. Vit hava jú onga útvalgsbetoukning givið; men R. Rasmussen, hugsi eg, hevir heldur ikki skrivað sína. Táið útvalgsbetoukningin fyriliggur, skal eg eisini hava greitt frá míninari stoðu. Eg havi hoyrt juristar siga, at tað er ógvuliga vanskuligt, táið pettir verða tikin burtur úr einari lóg og onnur pætti sett í staðin, so at vera vissur í, at eisini alt er vorðið so gott av broytingunum, at ikki okkurt er gloymt, ið kann vera til skaða fyri hildini. R. Rasmussen kann siga, at í hansara uppskoti eru ymiskir tankar, sum hann er

góður við, men at tað sum lóguppskot skal vera so gott at løgtingið kann vera tjent við at senda tað frá sær, skal hann ikki siga so vist. Frá princippunum hevir R. Rasmusson ikki greitt skriftliga, og so leingi eingin betonkuing er komin frá honum, eigir hann ikki at spyrja eftir, hvussu aðrir menn stilla seg til spurningin.

R. Rasmussen: Eg haldi, at tingmaðurin úr Fuglafirði hevir haft nóg langa tíð til at gera sær eina meining um hetta mál, tí tað hevir nú fyriligið hær so leingi, í so mong ár. So hann mátti kunnað sagt okkum sínar grundir til ikki at vilja taka nakra støðu nú, og ikki halda sína hugsan tilbaka.

A. Samuelsen: Eg havi onga hugsan hildið tilbaka. Eg havi henvist til forhandlingarnar ið eru førdar á løgtingi í 1913 og úrslitið úr teimum; og tá man nú er farin frá tí uppskoti, havi eg sagt, at eg havi ikki haft stundir at gera mær eina meining um hetta nýggja uppskotið enn. Nær R. Rasmusson hevir fingið tasikkurheit, hann nú hevir, veit eg ikki, tí undir útvalgsforhandlingunum var hann heilt ósikkur.

J. H. Poulsen: Eg skal siga sum mína meining, at eg haldi tað vera beint at selja hesar garðar. Tá Matrass meinar, at tað er at behalda góðsið sum ein samlaðan eigindóm, so er hetta nettupp mínir tankar. Kommunan kann keypa garðin og skaffa monnum jørð, slakt, torv eins væl og presturin nú, hon má eisini kunna dríva hann líka gott sum presturin. Kanska vildi tað verið rætt at fastsligið at jørðin bara kundi latast í festi og ikki til salg, men eg hugsi ikki tað vil vinna tilslutning. Vit hava gingið útfrá at garðurin ikki verður seldur frá teimum, ið sita við honum, men tað hevur ikki nógv at betýða, tá vit fasthalda at næsti presturin má finna seg í at garðurin verður seldur. Ellars má hann taka hann í festi. — Samuelsen spyr, um vit hava lagt vekt uppá at sikra teimum monnum jørð av prestagarðinum, sum hava dyrkað. Tað hava vit verið einigir um at gera. Leigutreðir kunnu seljast til menn sum hava uppdyrkað tær; tað kundi verið, at man átti at føja til, hvat prís teir skuldu haft tær fyri. Men kommunan verður jú undir kontrol, so hon ikki kann skaffa sær óberættigaðan fordeil.

At draga hinar embætisgarðarnar uppí vil sum sagt gera sakina meira innviklaða. Skulu teir seljast má tað vera við nítm serliga lóg.

A. Samuelsen: Eftir tí, her er talan um, kunnu teir menn, sum hava uppdyrkað sínar treðir, ikki vænta at fáa tær til keyps fyri 50 kr. kúfóðurið, viss tað ikki verður fastsligið frammanundan. Eg dugi ikki at forstanda tað endringsforslag, Rasm. Rasmussen hevur framsett, ísoláta; neinliga hvat stilling teir skulu fáa eftir tí, sum hava dyrkað treðir av embætisjørð.

R. Rasmussen: Tað er ikki ringt at forstanda. Teir fáa sínar treðir í festi og avgiftin verður fastsett av kommununi undir løgtingsins góðkenslsi.

J. M. Matras: Eg vænti ikki, at atgongdin fyri óbenidlaði fólk til at fáa jørð verður løtt. Eg frykti eisini fyri, at tað verður nógso bekostiligt fyri kommununa at dríva hetta arbeiði. Hvønn fáa teir til tað? Eg vildi haft, at hesir treðarmenn skuldu kunna fingið síni stykkir tilkeyps uppá somu vilkor sum treðarmenn av festigóðsi.

J. H. Poulsen: Viss kommunan keypir til vurderingsprís kann man ikki forlanga, at hon skal selja jørðina útaftur til sama prís. Treðir av prestagóðsi eru ikki seldar fyri 50 kr. Tað er vanskiligt her at ásetta nakran prís frammanundan, men tað er eingin fára við tí, tá kommunan er undir kontrol.

A. Samuelsen: Eg havi tonkt mær, at man longu tá man selur jørð frá prestaembætunum setur ein prís á, sum teir, sum hava dyrkað jørðina, skulu fáa hana fyri. Eftir Rasm. Rasmussens forslag verða teir eitt slags kommunubendur, sum hava jørð sína í festi frá kommununi. At fáa forholdini ordnaði uppá tann máta eri eg ikki serliga glaður yvir. Hesir menn hava moralsk krav á ein betri stilling enn tað at vera kommunubendur og fáa sína leigu fastsetta av forstandaraskapinum. Tað er ein keðiligur stillingur.

R. Rasmussen: At tingmaðurin í Fuglafirði hevur mistillid til kommunur og løgting kann eg ikki gera við. Tað havi eg ikki.

A. Samuelsen: Hatta er eitt dømi uppá, hvussu Rasm. Rasmussen argumenterar. Eg vil ikki vera við til at avreiða hesar menn og teirra interessur til kommununar.

R. Rasmussen: Vit kunnu líkagott koma at gera órætt móti hesum monnum við at fastseta avgiftina uppá forhond. Vit eru ikki ístand til at yvirskoða teir skiftandi konjunkturar.. Man er eisini best ístand til at taka hensýn til, hvat virði grundforbetringarnir hava í samanburði við tíðina sum teir fáa tað í festi. Kom munan og tingið kann taka øll bílig hensýn til traðarmenn og uppsitarar eftir okkara uppskoti.

J. M. Matras: Eg kann minnast, at tá prestarnir reistu hendan spurningin í 1916, tá vóru teirra inntøkur av gørðunum ikki so lítlar. Stutt eftir hetta kom lóg um at avhenda stykki av bóndagóðsinum. Man kann nú fáa eitt kúfóður óuppdyrkað fyri 50 kr. Tað var tá andragandi inni frá Viðareiði um teir kundu fáa prestajørðina til sama prís sum mann fekk av festigóðsinum. Mon seinni hevur hetta ligið stilt, meðan nógvar traðir eru tiknar burt av festigóðsinum. Vit eiga at siga, at menn sum vilja hava traðir av prestagóðsinum skulu hava fyrsta ratt framm um kommununa.

A. Samuelsen: R. Rasmussen sigir, at tað er einki í vegin fyri at tingið kann taka hensýn til teir grundforbetringar, sum eru gjørdir. Teir sum sita á hesum traðum hava ongan rætt at krevja, at tað skal takast hensýn til teir. Um man selur, so skal tað vera fyri bíligan prís. Og eg haldi, at man ikki utan víðari skal selja til kommununa fyrst. Eg haldi ikki, at nakar kann innotiganga teimum betraktningum, sum eg og Matras hava gjort. Annars vil eg mæla til, at sakin fer til triðju viðgerð.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Vetrarfriðing av traðum.

2. viðgerð.

J. H. Poulsen greiddi frá nevndaráliti og mælti til, at sakin fór til 3. viðgerðar.

P. Nielsen: Hendan sak var til viðgerð á tingi íjor og tað varð talað um hana tá. Tórgarð og eg hovdu tá sett framm eitt uppskot til lóg, men sakin varð útsett til í ár. Og nú er hendan nevnd komin framm við uppskoti í sakini. Tað krav sum her er reist frá Havnarborgarnum er eitt natúrligt krav. Seyðurin hevur ligið á traðunum, so at tað arbeiði, sum menn hava gjurt har, ikki hevur givið tær fruktir, tað hevur kunnað givið. Teir menn sum hava lagt tær flestu traðir inn, eru arbeiðsmenn og fiskarar, sum í teirra fríløtum hava lagt stórt arbeiði niður har. Og so er tað eitt annað: At bóndabrúkið her í Havn ikki spælir sonn rolla sum á bygd. Hesir menn bóðu í hønarbrævinum ífjør um við lóg at fáa traðirnar til keyps. Nevndin hevur tó ikki uppfikið hendan spurning, men bert bildið seg til vetrarfriðing.

Nú er hertil at siga, at tað er koðiligt, at ikki báðir spurningar verða loystir ísm men tað er vón um, at vorður vetrarfriðing nú fingin í lag, kann hitt altíð ordnast seinni, so teir, ið vilja hava teirra leigutraðir til keyps, kunnu fáa tað, táið teir sokja um tað. Eg mæli til, at tingið tekur við vælvild undir hesa sak.

H. C. W. Tórgarð: Eg kann vera glaður yvir hetta uppskot, ið her liggur fyri um vetrarfriðing, serliga tí tað næstan er tað sama, sum tað, eg var við til at framseta broytingaruppskot um ífjør. Tann einasti munur er avgjørdan av hvørjum avloysingin skal tilfalla. Tað gekst ikki væl við okkara uppskoti ífjør, og fár hava 4 av nevndarmonnunum undirskrivað við forbehold, so eg havi kortini ikki góðar vónir. Eg haldi tað vera fullt berættigað í hesari sak at taka Havnina fyri seg og bygdirnar fyri seg. Hetta uppskot sigir einki um keyp av traðum; eg skal av terri grund einki gera til hindurs fyri lóguppskotinum, tí tað er jú beint, sum ordforarin sagði, at tað er atgongd til keyp av leigutraðum eftir teirri gomlu traðarlógini, í hvussu er til keyp av traðum av Húsagarðsjørðini. Eg vil stemma fyri uppskotinum.

Jørn Poulsen: Nogle af Udvalgsmedlemmerne har underskrevet med Forbehold, og jeg er en af dem. For mit Vedkommende var jeg ikke til Stede, da Sagen blev behandlet i Udvalget og da jeg ikke fik Tid til at sætte mig tilstrækkelig ind i Lovforslaget, valgte jeg at underskrive med Forbehold. Hvad angaar Tanken om Vinterfredning af Husgaards Trær, kan jeg godt gaa med til det, da Husegaard allerede er ødelagt som Havebrug, men jeg tror ikke det vil være godt at faa almindelige Regler herom.

A. Samuelsen: Eg havi skrivað undir við forbehold, men eg vil siga tað sama sum Jógvan Poulson, at og gangi við til hatta, tí eg meini, at viðurskiftini í Havn og úti á bygdunum eru so heilt ymis, at vit ikki kunnu gjøgnumføra tær sonu reglur úti á bygd. Eg skal annars siga, at eftir traðarlógini hevir man akkurat tann sama rætt til at selja traðir burtur av Álakersagarði sum av Húsagarði.

N. Debess: Eg var millum teirra, sum ífjor stemmaðu fyri tá at fáa sakina avgjørda, og eg eri glaður yvir, at hon kann verða avgjørd í ár. Tað er gleðiligt at hoyra teir, ið hava skrivað undir við forbehold, siga seg at vilja stemma fyri uppskotinum. Hetta er aldeilis nøðugt at fáa ordnað. Viðvíkjandi keypi av traðum, so hevir tað kannska minni hast, men táið A. Samuelsen sigir, at her hevir verið atgongd til keyp av Húsagarðsjørðini og Hornagarði, so hava í hvussu er verið lagdar harðar treytir á, áðrenn traðir av teim gørðum hava fingist til keyps. Og tað má sigast at hava verið so nógv meira torført at fáa til keyps av Hornagarði enn av Húsagarði.

A. Samuelsen: Tað og segði, má forstandast soleiðis, at lógin er eins fyri garðarnar; hvussu hon hevir verið praktiserað, er ein onnur sak. Eg eri ikki ókunnugur við, at tað hevir verið nógv meira torført at fáa traðir til keyps av Álakersgarði. Men eg havi hoyrt, at ein av grundunum hertil er, at tað hevir verið ætlað at selja garðin til Havnar kommunu, og eg havi hoyrt skiftandi umtalsmenn givið tað sum grund.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur laygardag 20. september.

Formaðurin: Fremsættes nogen Indvending mod Protokollens Rigtighed?

R. Rasmussen: Eg vil gera innsigilsi ímóti upplestrinum av protokolini. Her vóru ikki fleir enn 8 manns tilstaddir, tá 1ste partarin varð upplisin og 9 manns til seinna partin. Eg vil biðja formannin at protokolin verður upplisin, meðan tingið er beslutningsdyktugt.

Formanden: Jeg vil saa bede Sekretæren læse Protokollen op.

Lækni í Fuglafirði.

3. viðgerð.

Oðalsmaðurin (R. Niclasen) melti til at samtykkja uppskot meirilutans um at sakin verður niðurlogd til n. a.

Tað varð samtykt.

Skatturin til skjútskassans.

3. viðgerð.

D. J. Thomsen melti til at stemma fyri uppskotinum.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Lógaruppskot viðv. „Skøde og Panteregistre“.

3. viðgerð.

R. Rasmussen melti til at stemma fyri uppskotinum.

Nevndaruppskotið varð samtykt.

Útbýti av amtsfátækragrunninum.

3. viðgerð.

M. J. Winther melti til at samtykkja uppskotið.

Uppskotið varð samtykt.

Hospitalsmálið.

3. viðgerð.

H. C. W.-Tórgarð: Eg anbefalli nevndarforslagið.

Formaðurin las upp uppskotið.

H. C. W.-Tórgarð: Eg vil biðja um, at tað verður stemmað við navnauppróp.

Uppskotið varð samtykt.

Vetrarfriðing av traðum.

3. viðgerð.

J. H. Poulsen: Eg skal anbefalla hetta forslagið.

J. Patursson: Eg havi ikki verið her á tingi tá sukin fyrr var til viðgerðar, tí eg havi verið sjúkur; og vil tí gjarna siga nøkur fá orð her við 3. viðgerð. Her fyriliggur ein spurningur, ið hevir verið nógv á máli manna millum; hann var tikin upp av búnaðarnevndini í 1911, men teir víktu av frá at fara undir hann tá, tí teir hildu, at tað vildi koma ein stórur stoðgur í atgongdina til at fáa traðir. Hvat sjálvt tað at vetrarfriða traðirnar hevir at týða, so vilja menn siga, at hetta uppskotið her nítur bert inn á Havnina. Men eg má siga, at tað vil koma so í lag, at tá hetta fyrst er komið í lag fyri Havnina, so vil tað sama krevjast alla aðra staðni. Hetta er ein tokulóg, ein taka av annars manns ogn, ein ekspropriatión; og yvirfyri sovorðnum havi eg altíð verið eitt sindur varin. Táið tað almanna tekur eftir grundlógini, so tekur tað ikki utan viktugar og umráðandi grundir, men eg kann ikki síggja tær her, og eg kann ikki vera fyri hesum í hesum búnaði. Eg havi altíð hildið, at vit skuldu hava eitt serligt ting til at fremja búnaðarlógirnar, tí tær eru so nær í samband hvør við aðra, og tað er tí ikki gott at taka einstakar fram um aðrar. Traðarlógin, ið nú er, er soleiðis, at man kann fáa traðir til keyps fyri naustan einki; tað er já so, at man letur fyri hvort fóðurt 1 kr., tað er eitt so láturliga lítið viðurlag, at bøndur kunnu illa vera hekntir at taka ímóti. Eg havi altíð roynt at sleppa mær av við hetta, men havi verið noyddur at taka ímóti tí. Sjálvsagt er hetta ein so órøttilig gerð, at taka jørðina soleiðis frá bóndunum, utan at geva teimum eitt virkuligt viðurlag. Bøndurnir hava kortini einki sagt til hetta, og grundin til, at teir ikki hava verið so nógv ímóti, at stykki fyri stykki varð tikið av undirhøgunum, var tað, at teir hildu seyðabrúkið ikki líða so nógv undir hesum, um seyðurin um veturin kom inn á traðirnar. Men um nú vetrarfriðað verður, so verður fylgjan, at seyðabrúkið verður ómøgnuliggjørt. Hevði tað nú verið soleiðis, at sølan av traðarstykkjum og vetrarfriðing kundu gingið javnsíðis, og peningurin av soluni kundi gingið til at bøta høgan aftur, byggja seyðahús og annað, so kundi kannska tala verið um hetta. Men nú siga teir, ið vilja hava vetrarfriðing: vit vilja ikki hava annan manns kríatúr gangandi á okkara bøi. Hartil er at siga, at teir hava fingið traðirnar fyri næstan einki, og so mega teir jú eisini tola eitt sindur. Um so verður, at traðarmennirnir kunnu siga, at teir vilja hava sítt fyri seg, so má hagin kunna siga: eg vil hava mítt fyri meg. Hyggja vit eftir hvussu er hor við Havnina, so gongur seyðurin inni á traðunum eftir 14. oktober og til 15. mai. Men hyggur man so eftir høganum um sumarið, so er hann yvirlagdur av kúm, gásum, uppgrópaður eftir torvi av nærum hvørjum manni. Skuldu traðirnar vetrarfriðast, so mega bøndur kunna krevja at ongar kýr skulu vera í høganum, ongar gæs, eingin torvskurður. Yvirhovur er tað jú so í landinum, at høgaánarnarnir kunnu siga nei til torvskurð, og tað hugsi eg vildi verið eitt ringt býti fyri traðarmenn; eg vænti, at maogur vildi behildið torvskurðarrættin og ábrakstrarrættin fram um tann vinning, ið fylgir av vetrarfriðing. Viðvíkjandi hvat týðning tað hevir fyri eina tróð, at vera vetrarfriðað, so talaðu vit um tað ífjor, og tá hildu vit, at fingu vit eina reyndarstoðu, so kundi hon fáa okkum fulla vissu um, hvat vetrarfriðing hevir at týða. Tá hildu vit, at vetrarfriðing lá so langt burtur, at vit kundu bíða og síggja, hvat úrslit roynslirnar av hesum vildu geva. Mín meining er, at við tí vanliga bráki, ið vit nú hava, so er eingin annar vinningur av vetrarfriðing, enn at grasið verður fyrr bágvið til at slá. Nú er tað kent, at verður tíðliga sligið og ofbirgróðurin ikki verður bitin, so lívir hann ógvuliga nógv fyri rótunum og so kann fáast nógv hoyggj næsta ár. Men letur traðarmaðurin, sum síðan er, sína

kúgv ganga á tromi aftanú sligið er, tá verður hon nærri bitin enn av seyðinum. Tað ið og haldi sorliga kann sigast at meinska fyri bøin, er um seyðurin kemur ov tíðliga inn á traðirnar; um so maðurin t. d. veltir røtur, kunnu tær ikki vera fullbúnar og tað er sjálvandi stórt spell. Um mann skal siggja við almindiligum jarðabrúkareygum uppá hesa spurning —, og tá má mann eisini taka hetta oinastandandi tilfelli í Havn við — so verður ein skjótt klárur yvir at hetta er ein stórur knekil, sum ikki væl kann loysast uttan at okkara jarðabrúk verður endurnýggjað. Eftir hesum kann t. d. ein tróð, sum varð innløgd ífjør, verða vetrarfriða fár. Hvat skal tað til, tá maður einki hevur valt av honni? Tað skuldi verið fast treyt at einki verður vetrarfriða utan tað er dyrkað. Vit mugu aldeilis avgjørt koma inná eina vetrarfriðingarlóg, tí vit sakna her fastar reglur at skipa eftir.

Vetrafriðinga avloysningurin skal metast eftir fullum virði og ásetast av landvesinskommissiónini. Her átti ein vurderingskommissión at verið til at avgera. Tað er ikki landvesinskommissiónin, sum eigur at áseta hvat virði ið svarast skal av tøku av jørð. At endurgjaldið fyri Álakers garð skal fara í statskassan er óbeint; tað eigur at fara undir logtingið, tað eigur at hava vald yvir tí. Tað er ódonni av okkum at sonda meira pengar í ríkiskassan enn vit hava gjørt. Vit eiga heldur at gera alt møguligt ímóti tí, so eingir pengar hereftirdags fara útav føroyskum jarðabrúki í ríkiskassan — tað er alt ovnógv farið tann vegin. Eg ivist ikki í, at ríkisstýrið, um hotta verður greitt fyri teimum, vil siga, at tair pengar, ið fáast kunnu úr Føroya jørð, teir mugu tit hava í náðum.

Eg má biðja tingið halda mær til góðar, at eg komi so seint við mínum atfinningum; tað er jú altíð kediligt tá uppskot er sett fram, at tað so í ofsatu stund skal møta stóran mótdrátt. Men eg havi ikki kunnað gjørt við tað - - forfall brýtur allar lógir. Eg hevði halt bestan hug at uppsett hetta mál til vit kunnu fáa ting í vetur til handfaran av landbúnaðarlógunum.

K. Rasmussen: Eg eri eisini í hesi nevnd, men havi skrivað undir álitið við forbehold. Grundin er tann, at eg eri fyri vetrarfriðing av hoi í heila tikið. Skal botn brúkast sum botn, so er tað sjálvandi gagnligast fyri hann at seyður ikki sloppar at bíta hann útá várið og heystið. Hosum gongur víst tingin ímóti. Annarleiðis má ein siggja uppá tað, sum ikki verður nýtt til planturøkt. Sum allir vita verður grasið nógv snoggari, har seyður sleppur at bíta tað árið runt og øðrvísi enn Føroyar hava sæð út áðrenn seyður kom í oynar enn nú. Men slíkt kann ikki takast hensýn til, tá formálið er at hava jørð til seyðabrúk. Allastaðni har talan er um seyðabrúk sum høvuðspartin av búnaðarbrúki kemur spursmálið fram um hvat gagnligast er: at hava vetrarfriða olla ikki. Tí mangu ávísar treytir fylgja við vetrarfriðing, t. d. at tróðin, sum friðast skal, vísir seg at vera eitt stykki, hvar brúkarin ger alla hevur gjørt eitt arbeiði fyri planturøkt. Soleingi ein leigutróð liggur ódyrkað, er tað meiningsleyst at vetrarfriða hana bara til at grasið kann vaxa upp og rotna niður aftur í deyðadyngju. Tá hevði seyðurin halt betri gagn av at eta tað. Fyrsta treytin má tí vera tann, at stykkið virkuliga er uppdyrkað. Hetta er ikki komið fram í uppskotinum og tí havi eg undirskrivað við forbehold. So eru eisini aðrar treytir. Maðurin, sum vil hava bø sín vetrarfriðaðan, má pliktast til at halda garð um stykkið, so øll jaktin av seyði verður útilukkað. Eg havi so tíðan verið viðmi til, at seyður liggur inni á vetrarfriðaðum traðum og verður jaktaður hensýnsleyst, grýttur undir við gróti og trøum og hvat annans er fyri hond. Garðurin er sum oftast lágur við píktráði í ervu og langt er millum sleyrarnar, so seyðurin krýpur inmundir píkatráðin. Píkarnir eru tí ofta umvavdir við ull. Hvussu hesin seyður hevur tað, sum soleiðis verður rikin ígjognum aftur og fram kann ein og hvør ætla. Æðrin skal tí maðurin syrgja fyri at garðurin er so verðin, at seyður ikki sleppur ígjognum ella eisini skal hann lata seyðin vera í friði. Annans gangi eg fegin við til at stemma fyri vetrarfriðan, táið tryggjandi treytir fylgja við. At tað er neyðugt fyri planturøkt, helst her í Føroyum, at hava stykki fritt fyri annans kríatúr er sjálvandi, allarmest tíð her er hópur av plantum, sum krevja at standa langt út á heystið, um tær skulu nýtast og verða til fult gagn. Tað er tí altíð píndigt fyri fólk, sum fáast við at dyrka, at siggja at grøðin ikki fær fullan frið. Her eru tær neyðturviligu treytir heldur ikki tilstaðar í uppskotinum.

Eitt annað er spursmálið um leigutróðir. Har siga vit, at leiga er líkagóð sum ogn, tá ikki fráfaringardagur er komin. Okkara uppskot er grundað uppá at einki oyra av avloysningspeningunum skal fara í statskassan, tí staturin eigur einki virkuligt

krav uppá jørðina í Føroyum; fólkaraðsliga sæð eigur hann einki í henni. Tann peningur eigur at fara í løgtingsins kassar. Tað er kanske rætt, at bóndin, sum situr á festinum, skal hava afturfyri tað spell, hann líður av, at seyðurin ikki sloppur at bíta træðirnar. Tí kann eg ikki við góðari samvitsku vera við at fremja hetta.

J. H. Poulsen: Tað hevur verið so, at mun behandlaði sakirnar við 2. viðgerð. Og tá eingin er komin við broytingaruppskoti til 3. viðgerð, so plagar mun at betrakta sakirnar sum útdebatteraðar. Eg meini tí, at vit nú skulu halda okkum bara til avstemningina.

J. J. Weihe: Tað er skiligt, at táið maður hevur fingið trøð, so vil hann hava so nógva nyttu av henni sum møguligt. Nógvir halda, at tað kunnu teir ikki fáa so leingi sum træðirnar ikki eru vetrarfriðaðar. Eg meini ikki, at seyðurin ger træðunum so nógv fortreð sum mangir halda. Kanska tað var betri, um tað varð friðað longri út á heystið. Tað hevði ikki skaðað seyðinum. Eg haldi, at tá Havnarmenn hava fingið sítt ynski uppfylt, so vilja krov eisini koma frá bygdunum, og tí kann eg ikki stemma fyri hesum.

S. P. ár Kongi: Á bygd eru jú somu viðurskiftir sum í Havn. Men eg haldi, at hetta, sum fyriliggur her, ikki loysir spurningin. Eg haldi, at løgtingið má skera full komiliga ígjøgnum spurningin fyri alt okkara land ísenn.

H. C. W. Tórgarð: Mær dámar uppskotið væl. Eg ivist ikki í at mínum veljarum og Paturssons veljarum eisini dámar tað væl. Tað krevur eitt stórri arbeiði, áðrenn man avgor tann spurning her á tingi, hvussu træðirnar skulu yvirganga til ogn; men um hetta verður samtykt, so hava Havnarmenn uppnáð tað mesta av tí teir vilja. Eg haldi, at vit mugu vera klárir yvir, at forholdið er eitt sindur annað í Havn enn á bygd. Kanska bygdir koma hvør forholdið við tíðini verður í tuðarbúski tað sama sum í Havn. Tað er longu í træðarlógini givið loyvi til viðvarandi friðing. Nú er munurin, at træðarmenn skulu fáa fullan rætt til at fáa træðirnar vetrarfriðaðar. - Seyðurin kemur á træðirnar um heystið, og tá ger hann tann stóra skaðan við tað, at hann gnagar grasrótina. Og sjálvt um grasið er sligið soleiðis, at stubbarnir standa ríkiliga eftir, so gnagar seyðurin tað av. Paturssom nevndi sína viðmerking við votrarfriðing: At grasið er skjótari búgvið til sláttur. Ja, tað vísir seg ár eftir ári, at tað verður verri og verri af fáa hoyggið inn, vegna óterra. Og tað er ikki gott hoyggj, sum fast á hendan hátt. Frá tí ein troð verður innlogd til hon er dyrkað so liggur nógv arbeiði í henni. Tað er leingi, áðrenn ein troð er liðug dyrkað. Eg vil mæla til at tingmenninir stemma fyri hesum uppskoti.

Poul Niclasen: Eg úttalaði meg útførliga ífjør og segði eisini nakað ígjár. Eg kann forstanda Paturssons sýnspunkt frá einum bónda sjónarmiði. Men í hesum samanhangi má man minnast til, at tað er komin ein standur, fiskarar og arbeiðsmenn, sum vilja hava jørð og hava teirra jørð í frið, og tað nyttar ikki, at andøva imóti hesum streymi. Tí hví skulu hesir menn, sum hava lagt so nógv arbeiði í hesi jarðarstykkir, ikki hava líka góðan rætt til, at tað oftanliga tekur sær av teirra interessum? Eg skal takka ørðforaranum fyri, at hann hevur sett hetta uppskotið fram, og um tað ikki eydnast okkum at fáa hesa sak ígjøgnum í ár, so vil hesin spurningur vera loysur fyrr ella seinni. Tað eri eg yvirbevístur um. Viðvíkjandi spurninginum um votrarfriðingin er góð ella ikki, so er tað besta bevísið, at hesir 62 menn eru komnir við hesum bønarbræv.

N. Debess: Eitt einasta vil eg berøra, sum eg ikki goll kann liga til. Tað var tá Paturssom sagði, at træðarmenn so at siga fingu sína stykkir til gávu. Tá man veit, hvussu nógv tað kostar einum manni í arbeiði og slíti frá tí hann hevur tikið eitt stykki úr haga, og til troðin er fullt dyrkað, so kann man ikki tala soleiðis. Oftast er tað eitt slíkt drúgfort verk at tann maður, sum leggur troðina um ikki nær at fáa tað fulla nyttu av henni. Og hvussu nógv av pengum má hann ikki lata í hesum arbeiði. Tað mátti tó vera ein munur millum ein træðarmann, sum skal taka jørð upp úr nýggjum og so ein fostara sum tekur við garðinum. Okkara bønder í Føroyum eru faldir til nógv gott, meðan ein stórur partur av Førovingum má slíta hart fyri at fáa eitt lítið pett av jørð lagt inn undir kultur. Eg vil stemma fyri, at hesir menn fáa so góð arbeiðskor sum gjørligt er. Eg haldi, at hesin spurningurin má kunna loysast uttan at man betraktar spurningin í sínni heild fyri allar Føroyar ísenn. Havnin er eitt undantak her.

J. Patursson: Eg má biðja orsaka, at eg var nakað ilskorligur, men tað var tí, eg ikki var til stoðar við tær fyrru viðgerðir. Tað kom fram her í tosinum, at tað eru nakrir menn, ið altíð skulu verja bóndarætt og nakrir, ið mega verja traðarmenn; hatta er skaðiligt tos; jørðin er okkara almenna ogn, og tað eru nógvir ymiskir brúkarar á hesi ognini; tað eru bæði bondur og traðarmenn. Eg haldi ikki, at mann kann leggja mar til, ikki at hava viljað arbeiða eins væl fyri ollum, ið fáast við jørð. Tað er skeivt at siga, at bøndur koma til lús og skoru kleði; og kom til ein garð, ið var væl umsitin eftir gomlum føroyskum brúki, men tá eg fór at umleggja hann eftir nútíðar brúkshátti, havi eg verið tað mesta av 30 árum um tað arbeiði og haft bæði stórt arbeiði og stórt stríð av tí. Eg bað menn ikki misskilja meg, tá eg segði, at traðarmenn fáa traðirnar fyri næstan einki, og meini, at 100 kr. er einki í nútíðini, tað eg meini mest tvørrar hor, er at traðarmenn ikki hava fingið atgongd til lagalig lán til harfyri at dyrka upp og byggja hús á traðunum, við tað at lánslógin til traðarmenn ikki er gjøgnumførd. Eg dugi ikki at skilja, hví Havnarmonnu ikki skulu fáa teirra traðir til keyps so væl sum bygdamenn. Tað er framhildið, at tað eru kommunalar interessur, ið gera tað, men táið bóndainteressur ikki skulu skerja traðarmannа rætt, so eiga heldur ikki kommunalar interessur at skula kunna skerja rætt teirra. Eg trúgvi tað, at traðarmenn heldur ynskja teirra traðir til keyps enn at fáa tær vetrarfriðaðar. — Mon meinar, at Havnin skal hava hetta sær. Tingmaðurin úr Gøtu framhelt, at kom hetta fyrst í Havn, so krevja bygdamenn tað sama. Mær dámar ikki, at Havnin hevir nakað sær í slíkum spurningum, har eiga at vera eins reglur fyri alt landið.

H. C. W. Tórgarð: Eftir tí galdandi traðarlóg kann tann eina helft av Havnini fáa traðir til keyps, og tað er lagt upp til í fjor, at traðir eru seldar burtur av kongsfostinum, men tað hevir verið ógvuliga trupult at fáa til keyps av Hornagarði. Jóannis bóndi nevndi, at táið jørðin skal býtast úr, so eigur helst at onnast við arvafesti. Eg heldi hetta vera eitt spurning ið er ringur at loysa, og eg eri tí glaður yvir, at spurningurin um vetrarfriðing er komin fyri seg, so hann verður leittari at greiða; hetta loggja Havnarmenn mest vekt á. Vit vita, at tað er mjólkleyt í Forevum, og tann einasti máti at bøta um tað er at hjálpa traðarmonnunum, tí teir produsera tað mesta mjólk.

J. Patursson: Eg haldi tað vesentliga við sakina er, at Havnarmenn nógv heldur vilja hava traðirnar til keyps enn fáa tær vetrarfriðaðar; og eg eri keldur av, at Tórgarð ikki hevir lagt uppskot fram um at fáa traðir til keyps av Hornagarði, tí tað er óvættvíst, at teir ið hava lagt traðir inn av Hornagarði, skulu noyðast at sita við leigutraðum, við einum heilt leysum leiguforholdi, meðan teirra brøður, ið hava lagt inn av Húsagarði, lættliga fáa til keyps. Eg veit ikki, hví traðarlógin skal anvendast so harðliga yvirfyri Havnini, tá bygdarmenn allir hava lætta atgongd til at keypa teirra traðir.

H. C. W. Tórgarð: Eg dugi ikki at siggja annað, enn at Jóannes bóndi talar her sum bóndi. Eg vil bert siga, at eg trúgvi, Havnarmenn fyri treskkja nú at fáa vetrarfriðing fram fyri keypsrætt til traðirnar.

N. Debess: Eg má her beklaga, at hatta forholdið hevir verið til stoðar, at menn ikki hava fingið traðir til keyps av Hornagarði, meðan aðrir hava fingið til keyps av Húsagarði, og eg haldi tað vera logið, tí báðir garðar eru undir somu lóg.

M. A. Winther: Vit vita, at táið forholdið hevir verið soleiðis við Hornagarði, so er tað tí, at Havnar kommuna í mong ár hevir fort forhandlingar um at yvirtaka garðin. Eg sigi ikki umbætismonnunum illa fyri, at teir ikki geva traðarmonnunum ognarrætt, so leingi forhandlingarnar eru gangandi. Eg meini, at vit kunnu ikki samanbera forholdini í Havn og á bygd. Fyri langa tíð síðani átti Havnar kommuna at hava sitið við báðum gerðunum. Havnin er vorðin keypstaður, og bóndabrúkið stríðir harðliga ímóti býar interessunum, og eg veit ikki, hví man skal upprætthalda tær leivdir av bóndabrúki, ið her eru eftir, til stóran skaða fyri meginpartin av fólkinum í Havn. Eg vil tí stemma fyri hesum uttan uppá nakran máta at binda meg yvirfyri, hvussu forholdini skulu ordnast á bygd.

S. P. úr Kongi: Eg kann ikki vera við til at gera hondla mun millum Havnina og bygdirnar í hesum spurningi. Vilja vit ikki eisini hava mjólk á bygd? Ger sevðurin ikki eisini skaða á traðunum á bygd? Tað kann vera, at Sandoyggin er

eitt sovorðið Kanaans land, ið flýtur við mjólk og hunangi, men aðra staðni í Føroyum er traðarbrúkið ikki betur enn so, at traðarmenn mega krevja vetrarfriðing, um teir skulu hava nakað sum helst burtur úr sínum sliti og sleipi. Eg slutti meg til, hvat Tórgarð sigir, at teir vilja hava vetrarfriðing fyrst og seta keyp í aðri rokkju, tí tað fyrsta er tað, ið mest um ræður. Hvat ið viðvíkir sølu og keypi av jørð, so vísir tað seg, serliga her í Havn, at tann eina tráðin fyri og annur eftir við sølu dettur niður í hondina á teim fáu, ið eiga pengar. Í staðin fyri sum N. Debess at beklaga, skuldi man takka hesum umtnemnum fyri, at teir ikki hava selt av gørðunum. Nær sum helst mega offentligar myndugheitir verja fyri at søla av almennari jørð finnur stað, tí tað er aldri til gagns fyri samfundið. Jørðin eigur aldri at vera seld.

J. Patursson: Eg vil ikki vera við til at takka tí farna amtmanninum fyri, at hann ikki hevur selt traðarstykkir, tá tað bara er so, at hann ikki seldi av sínum egna. »Ravnur drepur ikki, har hann sjálvur eigurs sigur orðatakið og so var her. Hví finga mann ikki tráðir tilkeyps av Hornagarði, tá amtmaðurin alla aðri staðni var villugur at játta salg? Tað er einki at takka honum fyri.

Annars haldi eg, at tað átti at verið gjort nakað alvorligt nú frá tingsins síðu yvirfyri hesum Hevnarmonnum, sum so leingi hava bíðað uppá Hornagarð.

M. Samuelsen: Eg eri ikki við til yvirhøvur at vetrarfriða tráðir; tað vil verða tí føroyska seyðabrúkinum til altfor stóran skaða. Eg vil nokk vera við til at fáa teimum tráðir, sum einki eiga, men tá teir hava fingið tráðirnar, so hevur eisini bøiturin verið so ímótikomandi sum nakar kann krevja av honum. Skulu teir so eisini hava tráðirnar vetrarfriðaðar, so gera teir harvið faktisk seyðabrúkið til einki. Tá man yvirhøvur virkar hon til at leggja inn sovítt sum uppá nakran máta muguligt, so hevur samfundið harvið strekt seg so langt sum tað kann forsvarast; tað kann ikki ganga longur uttan at svekkja ein annan stand. Og vit hava ikki lov til at gera ein stand til einkis fyri at gagna einum øðrum. Nú er kannska ikki tað sama forholdið her í Havn sum úti á bygd. Men eisini her vil almindilig vetrarfriðing minka um hjá teimum, sum drýva seyðabrúk. Tá og yvirhøvur ikki eri stemtur fyri at vetrarfriða, so er tað tí at eg eri hangin fyri at draga konsekvensirnar av tí. Tað er ikki alt stórbøndur, sum eru eigindómsmenn í Føroyum.

H. C. W. Tórgarð: Tá tann seinasti talarin sjálvur innrømmar, at tað eru serlig forhold her í Havn, so mátti hann kunna gingið við til hetta forslagið. Her vil tað ikki skaða teir smáu eingindómsbesitararnar.

M. Samuelsen: Nei, men tá man fyrst er farin at grípa inn í hjá teimum stóru, so er man komin inn á eitt skráplan, sum tað seinri verður verri at verja seg ímóti.

O. Effersøe: Jeg er enig med de andre Udvalgsmedlemmer om, at man bør fremme denne Sag, men samtidig maa jeg betone, at Sagen er kommen saa sent frem, at det er umuligt at behandle den, som man burde. Der er fastsat en Bestemmelse om, at den, som har en Trø til Løje, kan faa den overdraget til Ejendom med Vintergræsningsret. Naar Spørgsmaalet foreligger om Selvejendom, maa vedkommende overtage Trøen med Vintergræsningsret til Løje. Jeg vil tage dette Forbehold, men vil stemme for Forslaget og haaber, at denne Fejl maa blive berigtiget.

J. H. Poulsen: Tað hevur verið brúkt á bygd at mann fyrst ímgongur eitt leiguforhold, sum so seinni verður avloyst av keypi. Man kann ganga út frá, at ein maður seinni vil fáa trønna til keyps.

J. Patursson: Eg kann ikki stemma fyri lógini, tí at hesi princippir, sum og ikki sýnist um, skulu gerast galdandi áleina fyri Havnina, og tí at tað er sett at salgsummun fyri Hornagarð skal ganga inn í statskassan. Her kemur eitt nýtt princippp. Og eg sum gamalur maður í búnaðarnevndini veit, at hetta vóru einastu sakir, sum vit ikki hildu okkum til at kunna fremja. Men nú hevur tingið í stuttari tíð avvikað ta einastu sak, sum vit ikki vóru fortir fyri at fremja.

Uppskotið varð samtykt.

. . . . . .

Svimjing sum kerugreht í skúlunum.

3. viðgerð.

Prósturin: Eg skal biðja tingið samtykkja uppskotið og at stemmað verður fyri hvørjum punkti fyri seg.

Uppskotið varð samtykt.

Lønhækkan til djóralæknans.

3. viðgerð.

J. H. Poulsen greiddi frá sakini.

O. Effersøe: Vedrørende den Godtgørelse, som skal tilfalde Dyrlægen, har jeg tilladt mig at stille et særligt Forslag. Det er naturligt, at Landbrugskonsulenten og Dyrlægen behandles under et, og det er rigtigt, at man stiller dem omtrent ens, og de bliver aflagte saa godt, at det bliver dueligе og veluddannede Mænd, som man faar til disse Stillinger. Særlig lægger jeg Vægt paa, at Landbrugskonsulenten bliver godt aflagt. Landbrugskonsulentposten bliver efter vort Forslag om Landbrugsskole vigtigere end tidligere. Jeg synes derfor, at det, som er foreslaaet i Løn for ham, ikke er for højt. Der er Forskel mellem Landbrugskonsulenten og Dyrlægen. Den første faar hele sin Tid optaget uden at indvinde noget ved privat Arbejde, medens Dyrlægen skal have Forbjenoste ved privat Virksomhed. Dyrlægen regner allerede nu sin Indtægt til 2000 kr. Og den vil blive højere. Under disse Forhold er det vel rigeligt at sætte Grundlønnen til 2000 Kr., da dertil vil komme Dyrtidstillæg og Konjunkturtillæg. Men jeg lægger mere Vægt paa det Punkt, som angaar Dyrlægens Diæter og Rejsegodtgørelse. Vi har vel taget Stilling til det i Fjor. De 2000 Kr., man on Gang fastsatte, svarer paa det nærmeste til Forholdene nu. Jeg maa gøre opmærksom paa, at vi den Gang tog Hensyn til Dyrtiden, og at de 2000 Kr., vi da fastsatte, svarer til Dyrtiden, der nu er. — Efter de nugældende Regler tilkommer der, saa vidt jeg har kunnet faa Besked, Dyrlægen Diæter for de Rejser, han foretager for offentlig Regning, 5 Kr. om Dagen og fri Befordring. Hvor meget disse 5 Kr. om Dagen beløber sig til, ved jeg ikke rigtig; det kan jo ikke blive saa meget. Men saa er der Befordringsgodtgørelsen. Der kan man sige, at den skal anvises af Amtet, og det maa være en Garanti for, at den holdes indenfor rimelige Grænser. Her maa man dog erindre de Regninger, vi fik i Fjor, der var meget betydelige, og hvis vi i Fremtiden skal faa mange saadanne, vil dette løbe meget op. Hvis Dyrlægen skal anvende Motorbaad, vil det betyde en stor Udgift, saa vil der blive forlangt Motorbaad i Dag, Motorbaad i Morgen, og det vil blive en stor Sum. Derfor vil jeg foreslaa, at vi fikserer disse Rejseudgifter, og naar vi sætter Beløbet rundeligt, antager jeg ikke, at vi gør Dyrlægen nogen Uret. Jeg har sat det til 1000 Kr., det samme som Landbrugskonsulenten faar til sine Tjenesterejser og Kontorhold. Saa vil vi undgaa, at Amtmanden kommer til at staa tvivlende overfor Regninger fra Dyrlægen. Hvis mit Forslag ikke bliver vedtaget, forbeholder jeg mig at komme tilbage til Sagen, da det saa vil dreje sig om betydelige Udgifter for det offentlige.

N. Debess: Tað er komið nakað nýtt inn í sakina, og eg vil lakka meirihlutanum fyri ta støðu hann hevir tikið, tó at eg haldi, at búnaðarráðgevarans lon er sett holdur lágt. Eg kann ikki vera samsintur við hrr. Effersøe, tá hann heldur, at tað ikki er neyðugt at hækka lønina í ár, tí prísirnir eru teir somu sum í fjør; vithava hevur jú netupp hæðkað bevillingar í ár, sum vóru givnar í fjor. Viðvíkjandi hvat djóralæknin ferðast saman borið við búnaðarráðgevaran, so er tað upplýst, at tann fyrrnevndi kemur at ferðast nógv meira. Har var eitt gott uppskot í fjor um ferðarútreishur, men mær dámar ikki hrr. Effersøes uppskot. Skulu vit hava djóralækna her, má hann kunna ferðast so nógv sum muguligt, og samanborið við, hvat aðrir læknar skulu hava til at ferðast fyri, er tað ikki annað enn rímiligt, at man gevur honum nakað fríar ræstur í hesum.

J. H. Poulsen: Eg kann vera samsintur við hrr. Effersøe um, at djóralæknin og landbrúkskonsulenturin eiga at vera nakað eins lontir, og eg kundi verið samsintur við honum um, at tað var gott, um vit vistu, hvat djóralæknin skal hava í ferðarpening. Men eg meini, at í ár kunnu vit ikki hava nakað yvirlit yvir, hvor ferðingur vil ganga til hetta. Tað er nøvðsynt, at djóralæknin ferðast, men vit eiga at híða við at fastseta ferðarpeningin, til vit siggja,

hvussu nógv krevst í minsta lagi. Eg hildi tað ikki vera beint nú at broyta, hvat vit samtyktu ífjor.

O. Effersøe: Jeg er ikke saa langt fra at tage mig Ordførerens Udtalelser til Indtægt paa den Maade, at de siger, at jeg i Virkeligheden har Ret. Ordføreren fandt det urigtigt, at vi gør det om, som vi vedtog i Fjor, men jeg maa gøre opmærksom paa, at vi vil gøre noget af det om: vi vil sætte hans Løn betydeligt op. Vi kan godt vente af det her, at Dyrlægen vil faa en aarlig Løn af 6—7000 Kr. foruden de Dage, han rejser, hvor han faar gratis Underhold, og det er en høj Løn for en Mand i hans Alder. Dyrlægen skal foretage bestemte Omrejser, og vi kan ikke forudsætte, at han ikke gør lidt Ophold paa de forskellige Steder, saa jeg er ikke bange for, at han skal komme til at rejse for lidt. Vi vil faa meget betydelige Udgifter af hans Rejser, hvis vi ikke fikserer Beløbet. Er vi først gaaet i Tøjet, d. v. s. har vi først fastslaaet denne Mande, saa bliver vi maaske hængende ved den. Dyrlægen er en ung Mand og har let ved at rejse. Man kan sige, at han bliver ældre; ja, men naar han trænger til dyrere Befordring, vil der vel altid være et Ægteting, der vil stille sig velvilligt overfor ham.

J. Pálsson: Eg vil gjarna spyrja, hvussu ein ungur maður kann ferðast bíligari hiðani til Fróðbiar enn ein eldri maður. Tað er nakað annað, táið talan er at ferðast eftir landi, har vil ein ungur maður altíð hava lættari við at koma fram enn ein eldri.

O. Effersøe: Det var et ejendommeligt Tilfælde, Hr. Pálsson tillod sig at pille ud, men selv om man tager dette Tilfælde, maa man kunne tænke sig, at den unge Mand vil kunne benytte Fartøjer, der var billigere. Men ser vi bort fra dette Tilfælde, vil en ung Mand lettere kunne gaa over Fjældet end en ældre Mand; denne maa gerne benytte Baadsfart, og det er i Reglen dyrt. Dyrlægen blev for sammentignet med Lægerne. Vi maa dog stille Lægerne betydelig bedre økonomisk end Dyrlægen.

N. Debess: Eg meini við, at Effersøe her hevur gjort nógsa stóran mun millum lønir, tí meðan djóradøkn in eftir hesum kann koma til eitur 6000 kr., eri eg ivaleysur í tí, at aðrir læknar aldri fara undir 10,000, og tað er tó ein góður munur. Sø hevur Effersøe í síðsta uppskoti sett mark fyri flotningspengarnar; tað er júst ikki egnað til at eggja hann at vitja tey plássir, sum longst eru burtur, og eg kann tænkja mær, at hann hoggligari kann vinna inn komin har hann býr enn um hann ferðast langt av leið.

O. Effersøe: Det er ganske urigtigt at sammenligne Dyrlægen med almindelige Læger. Skulde der iøvrigt ikke komme andet ud af denne Diskussion, saa haaber jeg i hvert Fald, at den vil bevirke, at vi i Fremtiden ikke modtager saa store Regninger fra Dyrlægen som de, der tidligere gjorde mig saa betænkelig.

A. Samuelsen: Eg ætli mær at stemma fyri fleirtalsforslagnum pkt. 1; hinsímóti vil eg stemma fyri pkt. 2 í Effersøes forslag. Tað er eftir mínum meining rætt at seta grensu fyri tí belopi, djóralækni kann rokna sær fyri fjarsturreisur. Vísir tað seg ovlítið, er logtingið væl altíð sinnað til at hækka tað.

Uppskotini vórðu samtykt uttan grein I í uppskoti Effersøes.

Latínskúli.

2. viðgerð.

Orðføraríu (Prósturin): Skúladirektiónin hevði ífjor hetta mál til umhugsunar. Hon hevur fingið upplýsingar tilvegar og lagt uppskot fram á tingi, har hon mælir til at stælgja við sakini fyri fyrst, av tí at hon ikki heldur líkindi vera góð júst nú at fara undir hesa fyritøku. Tann logtingsnevndin, sum hevur hildið sakina til viðgerð, heldur við skúladirektiónini í hesum.

A. Samuelsen: Eg havi ikki kunnað fingið fatur á betænkingunum. Nú heyri eg og orðføraríu sigur, at teir halda ikki at málið kann fremjast í ár á grund av umstøðunum. Tað undrar mig nakað, tí ífjor sýndust teir at siggja meira ljóst uppá tað. Eg vil tí gjarna vita hvørjar hesar grundir eru, sum gera at sakin ikki kann fremjast núr ikki tí, at eg júst eri so bráður eftir at fáa latínskúla.

Orðføraríu: Eg veit ikki, um vit sóu ljóst uppá hesa sak ífjor, men tað var

okkum íhvussu er greitt allareiðar tá, at hetta er ein vandamikil spurningur, sum má hugsast væl um. Grundirnar til, at vit ikki halda málið kann fremjast fár, eru mangar; og skal bara nevna tað, at vit máttu fata undir at byggja í stórum, tí realskúlin er longu ovlítil til sítt brúk.

A. Samuelsen: Eg haldi meg væl duga at skilja grundirnar. Men og havi verskt at sláa fást, at grundirnar til, at vit ikki kunnu fremja hetta mál, *ikki* eru tær, at vit hava eitt sambandsspartí her í tinginum — soleiðis sum tað ofta verður sagt.

Orðføraríð: Tá vit hava haft hesa sak til viðgerðar, hava vit ikki haft í huga ella tafu, at her vóru tvey politisk partíir. Eg vóni eisini, at táið sakin skal fremjast at tá allir Føroyingar standa sameintir uttan um hana, bæði sambandsmenn og aðrir.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Broyting í skjútslógini.

3. viðgerð.

D. J. Thomsen (orðførari meirilutans) mælti til at samtykkja teirra uppskot.

J. Rasmussen mælti til at samtykkja uppskot minnilutans.

Formaðurin las uppskotini upp.

M. A. Winther: Tó eg haldi, at hetta ikki er hálvgjort verk, so vil eg tó vera við at stemma fyri tí. Tað er ókeðiligt, um vit skulu bliva við at halda eitt spursmál uppi, sum er til so nógvan skaða og fortreð í bygdunum.

J. Rasmussen: Vit í nevndini hava verið samsintir í at avskaffa skjútsin. Sýslumannin fáa sínar pengar útbotalbar, men vit hava ongan at vísa prestunum til. Men um man fann eina loysning, so vildi eg gingið við til at avskaffa prestaskjútsin.

Edv. Mortensen: Eg vil eisini mæla til at stemma fyri minnitalsuppskotinum, tí tað avskaffar privat skjútsin og allan offentligan skjúts uttan prestaskjútsin. Fleirtalsuppskotið vísti á hvar prestarnir skulu fáa sítt frá — frá meinigheitini.

A. Samuelsen: Eg ætli eisini at stemma fyri minnitals uppskotinum. Grundin til, at eg ikki kundi stemma fyri fleirtalsuppskotinum, var tí eg ikki kundi stemma fyri at leggja prestaskjútsin yvir á meinigheitirnar. Men minnitalsuppskotið hevur tann feil, at tað ikki kann siga, hvussu skjútskassin kann fáa sínar útreiðslur aftur.

J. Rasmussen: Tað loysir gott vera, at tað er ein mangul. Um tað er so, er tað skitt. Eg frágvi ikki, at mann úti í kommununum heldur tað vera rættur máti, at forstandarskapið setur seg at dema um, hvør ið er í fólkakirkjuni og hvør sum skal hotala.

Edv. Mortensen: Í Danmark hevur man kommunal bestýrilsir, sum syrgja fyri hesum. Tað er eingin skomm at vera utanfyri fólkakirkjuna.

J. Paturssøn: Eg vil stemma fyri hesum uppskoti. Tað sum viðvíkur prestunum kann man koma aftur til seinni. Atvoldin til, at eg fegin ori við at fáa so nógv sum moguligt av skjútslógini burt er av hensýn til Effersøe. Hann uppslóg 1906 nakrar ætsisa hvarí sagðist, at eg hevði forvoldað, at skjútslógin ikki kom ígjognum. Nú hevur Effersøe haksað í 12 ár, so tað er gleðiligt, at hetta nú kemur til ein enda.

O. Effersøe: Paturssons Tanker kommer altid tilbage til 1906. Det vil forlænge Diskussionen, og det er ingen Nytte til, om man skal gentage de Kampe, vi havde i 1906.

A. Samuelsen: Eg fái tað inntrykk, at vit eingi bestemmilsir hava, hvar eftir vit kunnu líkna skatt til skjútskassan.

Greinir 1 og 3 í uppskoti minnilutans vórðu samtyktar. Grein 2 varð samtykt eftir broytingaruppskotinum (J. Rasmussens).

Formaðurin: Der vil nu blive stemt om Lovforslaget i dets Helhed.

O. Effersøe: Jeg maa komme tilbage til, hvad jeg udtalte for, at det falder meget vanskeligt at tage Stilling til Sagen paa den Maade, den er blevet behandlet. Skylden herfor er Lagtingets egen. Først og fremst, fordi Udvalgsbetænkningen er fremkommet saa sent, dernæst fordi den ikke er trykt. Jeg stiller mig derfor tvivlende overfor, hvorledes jeg skal stemme. Vi er sent paa Samlingen, og skal vi komme igennem Sagen, maa den jages igennem, og det er ikke heldigt. Jeg ser paa dette som de andre Medlemmer, at denne Skydspligt er uheldig og vilde derfor gerne stemme i den Retning, men jeg vil gerne være overbevist om, at den Afgørelse, som træffes, er den retfærdigste. Vi har ikke haft Tid til at tænke nok over Sagen, og faar vi en daarlig Ordning, vil jeg fastslaa, at Skylden er Lagtingets egen.

Uppskotið varð samtykt við 14 atkvøðum.

Broyting í fiskiskaparlógini.

2. viðgerð.

Joen Poulsen greiddi frá nevndarálitinum og mælti til samtyktar.

J. J. Weihe: Sum orðføraríin hevir úttalað, kom ífjor frá Nes og Sjóvar sókn andragandi um at fáa loyvi til at kasta nót ein mánað fyrr, enn man nú hevir loyvi til. Tað er eitt gamalt orð, ið sigir, at óvissur er hjallurin í sjómum: tað ræður um at taka fangstin tá hann er. Eg vildi tí ynskt, at útvalgið hevði líkið eina aðra stoðu. Tá árið líður, er ofta brim, og so er ringt at kasta nót. Eg trúgvi ikki, at tað er skaðiligt, um tað verður kastað nót ein mánað fyrr, enn nú er loyvt.

M. A. Winther: Einans 16 forstandarskapir hava innsent orkleringar og tey tykjast tey flesta at kenna lítið til at kasta nót eftir summarseiði. Sjey av teimum vita eitki at siga um henda spurning. 5 halda at ein slík broyting kanska kundi verið til gagn, meðan 4 ráða frá og halda tað verða til skaða at kasta nót hesa tíð av árinum. Har streymur gongur við landi. Tað sýnist soleiðis ikki at vera nokur trongd til eina slíka broyting, og eftirsum solítið av upplýsingum fyriliggur fyri útvalginum, hava vit ikki meint at kunna taka aðra stoðu enn at fyrisláa at goyma sakina og lata verða sum er við hesum.

M. Samuelsen: Eg havi forstaðið hesi forstandarskapir so, at tey siga, deils at tey ikki eru kompetent til at døma um antin tað loysir seg at dríva seiðafangst hesa tíð av árinum, deils at tað ikki ger skaða har streymur gongur við landi. Eg havi ikki forstaðið tað so, sum tað var summarseiður, her var talan um; nei, tað er tann stóri seiðurin, sum kann fáast ta tíðina. Út uppá veturin rýmir hann. Okkara úttalilsir kunna tá ongan skaða gera í hvussu er.

M. A. Winther: Tað kann vera til skaða fyri nótakast seinni, fyri summarseiðin. Menn eru jú her so ymiskir á máli: 5 svara at tað skaðar eitki, 4 at tað skaðar mógv. Her er ikki gott at taka dagar imillum.

Nevndarálitið varð samtykt.

Líkning til logtingið.

3. viðgerð.

Orðføraríin (M. A. Winther) greiddi frá nevndarálitinum.

Tað er óivað so, at við teim inntøkum, sum falla nú, so er hann ekonomiska situatiónin so mikið betri, at hon heldur kann svara 95,000 kr. nú, enn hon kundi svara 20,000 kr. her fyri. Og hevdu vit havt ta skattalógina, sum vit hava fyrisligið, so hevði tað gingið vel. Er tað so mógv, at vit til alt Føroya amtbrúka 100,000 kr.? Tá man hyggur eftir hvat útskrivingin til amtsrepartitiónsfondin er í Danmark, so roknast har við milliónum, og tó eru har mógvir aðrir skattir umframt. Eftirhondini sum samfundið útviklar seg, koma krovini til tað offentliga. Soleiðis er í øllum londum. Men tað er so vísiliga innrættað, at hægri krov tit befólkningin tess storri inntøkur. Tá arbeiðsmaður nú hevur nm fýra ferðir so hoga løn sum fyrr, og forretningsmenn og embætismenn hava líka mógv uppá seg, og inntøkurnar hjá teimum standa í líka forhold til krovini hjá teimum. Soleiðis er tað. Umsetingin

er vorðin størri, arbeiðsýtilsi er vorðið meiri, man fær meiri burtur úr arbeiðinum. Man talar um, at viðurskiftini nú um stundir eru ónormal. Men og halði heldur, at vit skulu rokna við, at tey eru normal og loggja okkara arbeiði har eftir. Vit eru ivaleyst komin til eitt mál hvar tað ónormala er vorðið normalt. Vit koma aldri niður aftur til eina lækkan av lønunum, og kanske heldur ikki til betýðiliga lækkan av lívsforneyðinheitunum. Tær útreiðslur, sum man noyðist at hava mugu lækka upp meir og meir. Vit kunnu ikki her í Føroyum — líka so lítið sum aðrastaðnis — bliva við at administrera við sonn útreiðslun sum fyrr. — Og man kann byggja eftir kommununum: Sjálvt har sum tað mest aftur haldandi forstandarskapið situr, er budgettið gingið upp til tað tvý til fýradupulta. Eg vænti at vit kunnu rokna við, at okkara útroiðslur verða uppstigandi og at tingsins uppgávur bliva størri og størri. Vit lantu okkum pening til telefonina. Tað gekk væl. Telefonin er nú ein fyritøka uppá ½ millión. Vit løgdu sanatoriið; tað var eisini fyri lán. Vit góvu 130,000 kr. í studning til vegbygging: eisini lán. Vit góvu 350,000 kr. í tilsagn til skipafelagið: uppaftur lán. Her eru vit óvissir í hvussu tað fer at gangast. Men vit vóru eisini óvissir, tá vit fóru undir telefonina, men nú hevur telefonin eitt nokk so stórt yvirskot. Viðvíkjandi repartitiónslíkningini, so leggi eg ikki í at siga nakað um hana, tí tað raður minni um antin ein kommuna kann bera 100 kr. meiri ella 100 kr. minni. Og eingin kann siga, at vit í repartitiónini eru komnir til eitt rætt resultat við t. d. at taka 50 kr. frá eini kommunu og leggja hetta til eina aðra. Tað einasta er kanske, at vit kunu taka meiri av teimum plássum, sum hava ein stóran skipaflota. Men tað er ikki gott at sita og siga, at hetta plássið hevur t. d. 20 skiparar og tað betýðir so og so nógv. Vit kenna ikki yvirskotið fyrr enn skipaflotin liggur aftur í havn. Man kann siga, at á teimum størstu skiparaplássunum sita toir størstu skipararnir eisini. Um man roknar 10,000 kr. í inntoku yvirhøvur uppá skiparan í ár, so hevir man eitt skattaovni í toim 140 skiparum, ið hava fært skipini í ár. Vit finna ikki hesar skiparar men ein skattalóg finnur toir, og vit fáa aldri ein rættvísan beskatning við líkning til amtsrepartitiónsgrunnin: um skatturin skal vera rættvísur, má hann vera eftir uppgávu av inntoku og eftir vaxandi skala. At skatturin er komin uppá 100,000 kr. í ár, hevir einki at týða, tá inntokurnar eru so stórar, men tað uholduga er, at vit koma at ráma kommunurnar órættvísliga og enn meira jarðagóðsið, soleiðis sum líkningin til amtsrepartitiónsgrunnin er. Eg skal mæla til at samtykkja hesa álíkning, sum her er skotin upp, vit hava roynt at taka hensyn til nakrar einstakar kommunur, men líkningin er í høvuðssakini sum ífjør; vit hava lagt eitt sindur meira yvir á tær kommunur, hvar skipini hoyra heima. Eg vil mæla til, at sakin fer til 3ju viðgerðar.

A. Samuelsen: Eg skal royna at gera stutt av og m. a. henvísa til tey úttalilsi, eg havi framfort her í ár um okkara skattaviðurskifti. Eg dugi ikki at siggja, at tíni orð tá eru svekkaði við hvat ið er framkomið aðrastaðni frá. At eg sá myrkt uppá tað við grund, er bekreftað av teim tolum, ið nú eru framlegd her, nú vit skulu fara at líkna. Hr. Winther helt fram, at vit undirskrivaðu betonkningin við forbehold. Ja, tað gjørdu vit, tí samlingin er so langt útliðin, og tíðin til útvalgsbehandling hevir verið lítil. Henda líkning líkist slett ikki teim líkningum, vit hava haft fyrr, sjálvt ikki í fjor, tá vit hækkaðu frá 18,000 kr. upp í 25,000 kr.; tað var einki móti hesi hækkun í ár. Tað er sjálvandi at hækka, tað liggur í tíðini oin tendensur til, at alt hækkar. Men hetta hevir kortini ikki borort amtsrepartitiónsfondin stórvegis fyrr enn í fjor. Táið seinasti status vísir, at vit standa illa í tí, so vísa teir fyrigangandi status, at amtsrepartitiónsfondin hevir staðið seg væl við teim smáu inntokum. Man kann siga, at so var ikki so nógv gjørt tá. Nei, sjálvsagt var ikki so nógv gjørt tá sum nú, tá nógvir pengar fara út; men viðurskiftini eru so, at vit her í Føroyum eiga at hava tendens til at hava heldur smáar útreiðslur. Eg skal minna á, at 1. okt. 1917, tað seinasta løgting, tá sambandspartíið hevði fleirtal, tá gekk roknskapurin út við einum konstantum beholdningi av 20,800 kr. Tað seinasta ár, sambandspartíið hevði fleirtal, var líkningin 18,000 kr. Várið eftir var sambandspartíið ikki longur í fleirtali, men fyrstu Mikkjalsmessu aftaná at føroyskir veljarar og aðrar kreftur við hevdu sett eitt sjálvstýrisfleirtal inn á ting, var yvirskotið minkað og líkningin hækkað til 25,000 kr. Nú hevir sjálvstýrispartíið rátt í 1½ ár, og nú er einki í kassanum, og nú noyðast vit at líkna uppá kommununrnar 76,000 kr. í staðin fyri 18,000 kr. Táið sambandspartíið avloveraði sítt fleirtal, tá hevdu vit tey lán, telefonin og sanatoriið hevdu gjørt neyðug.

men síðani ífjor á Ólavsoku gjordist tað okkum neyðugt at lána 700,000 kr. aftrat. Budgot okkara noyðir okkum at gera hetta lán. Eg má siga her, at tað ikki bert vóru sjálvstýrismenn, ið hava gjørt tað neyðugt at lána hetta. Hvussu nógv vit skulu lána fyri at fáa 450,000 kr. til damparan og Smiril kann eg ikki siga nøjaktiga, men eg ætli, at tað má vera minst 400,000 kr. Eg meini, at táið løgtingið ikki er betur stillað, so má tað ikki seta pengar í damparan, og táið Føroyingar eru so væl stilfaðir, sum tað hevir verið sagt, vildu tað verið dámligari, um teir sjálvir keyptu damparan, og løgtingið ikki fekst við sovorðið keyp. Eg meini ikki, at nógvir av hesum postum, ið eru uppførdir á roknskapinum, eru uppførdir ov høgt, eg meini tvørtur ímóti, at nógvir eru uppførdir ov lágt, t. d. til elektricitetsmálið. Løgtingið er vorðið dýrari; tá vit høvdu fleirtal koyrdu vit uppá tær gomlu dietir, tó og má siga, at eg haldi kortini, tær vóru ov lágar. Harímóti haldi eg, at referatið kundi vera spart, tí tað fer at kosta meir enn 2000 kr., sum tað er ansligið til. Føroyingar hava ikki enn fingið referatið frá ífjor, og tað at vit vildu geva tað út hevir ført til, at vit heldur ikki hava fingið sakreferatið til brúks fyri tingmenninar. Hevði tað so verið eitt stenografisk referat, kundi tað verið nakað.

Eg skal spara tingið fyri at gera bemerkningar til hvønn einkultan post, men bara siga nokur orð til tað, sum orðførarin segði. Tað, sum eg serliga havi ímóti budgettinum, er tann stigandi tendensurin til at føra útgiftir yvirá amtsfondin, har tær ikki hoyra heima, at seta í verk fyri amtskommunu rokning sovorðnar fyritøkur, sum av røttum áttu at verið privatfyritøkur og statsfyritøkur. Tað er blivið sagt somuleiðis ferðir, at vit høvdu verið heilt øðrvísi fyribúgvnir um skattalógin var blivin gjøgnumført: tær reglurnar, har vóru fyriskrivaðar, høvdu verið betri hóskandi. Fyri mær er tað heilt natúrligt, at tær reglur, ið anvendast skulu við amtsreppartitiónsfondslíkningin ikki kunnu hóska til eitt budgett uppímóti 100,000 kr. Tað var ikki ætlað í 1908 at koma inn uppá so stór beløp. Grundin til, at vit komu inn uppá skattalógina, var tann, at vit tá niðursettu eina millumtingakommissión til at yvirveya okkara skattaviðurskifti, og tað var tá framhildið, at tær broytingar, ið fyritiknar blivu, skuldu verða á sama grundarlag sum higartil, á amtskommunalum grundarlagi. Var tað skett, so hevði skattalógarupskotið fingið meira tilsvarandi ning enn tað fekk. Grundarlagið ífjor fordi m. a. til at samla allar løgtingskassarnar í eitt. Sambandspartiið helt sog ikki til pá eitt eygablikk at forláta tað gamla provaða grundarlagi; eisini vóru harí vissar separatistiskar tendensir, sum virkaðu nógso skremmandi. Vit hildu í hvussu var, at tær myndigheitir, ið skuldu krevja skattin áttu at hava leyligheit til at úttala seg. Uppskotið var tó viðtikið og sent niður, men ministeriið hevur sum bekent sent tað aftur, tí lógaruppskotið var ikki brúkandi. Svarið frá ministeriinum sigur ikki, hvat teir serliga hava haft at finnast at tí, og hvi í hvussu er ikki frætt nakað um tað, men eg ivist ikki í, at ministarans grundir til at vraka uppskotið eru tær somu sum hjá sambandspartíinum. Uppskotið er ikki tilstrekkiliga yvirveyað og deils eru her serligir tendensir í hesum uppskoti framum tey, vit fyrr hava sent niður. At grundin ikki er tann, at tað var ótilstrekkiligur stemningur fyri uppskotinum í løgtinginum og at ministeriið tí ikki hevur viljað fremt tað, er innlýsandi. Eg fráleggi sambandspartíinum alt ansvar fyri at lógin ikki er gjøgnumført.

Orðførarin sogði, at hesi tøl, vit eru kommin til, aldeilis ikki eru so forferdilig. Tað gleðir meg at hoyra so djarvar menn. Eg haldi, at talið er stórt, og vit eru ikki kommin á haddina enn. Tað vilja ganga mong ár, áðrenn vit koma niðuraftur. Um Føroyingar til neyð kunnu tola hesi tøl tað fyrsta árið, so koma tær tíðir aftaná, tá tolini verða hægri og inntøkurnar lægri, tá skattaevnan verður ein brokdeilur afturímóti hvat hon nú er. Hetta er tað nýrka punktið, at vit innretta okkum eftir fornótaðum botýðiligum skattaevnum og leggja budgettið við stígandi tendens til árini, tá skattaevnan verður minni og minni. Viss og hevði tað trúgv sum Mads Winther at og kundi sagt: større krav, større inntektir, so kundi tað saktans gingið, men tað tori og nú einaferð ikki. Finansmenn plaga í almindiligheit at hava lyndi til at síggja nakað nýrkt uppá tingini, men Mads Winther sær tvørtímóti nakað ljóst. Ingin skuldi verið glaðari enn eg, viss hann hevði sæð rætt. «Større krav - - større inntøkur» tað kann hóska, tá tíðirnar eru góðar, men kravini áttu ikki at verið tað fyrsta. Viss tað verður regulin, so er tað skeivt. Eitt full so gott orð er tað at seta tering eftir nering. Fólk hava vist stórar inntøkur í eygablikkinum og tað kann vera, at tað offentligu kann fáa nakað vist av teimum útúr hinnumanum á skattaborgarunum. Men so eru saniliga eisini onnur krav, ið stillast

til teirra. Tað er nú 4 ferðir so dýrt at liva sum fyrr og tað tordi verið eitt spursmál, um inntøkurnar í Føroyum eru 4 ferðir so stórar. Tað offentligu stillar eisini sínu krav til skattaborgararnar. Dýrtíðlóggevingin er givin okkum uppá tær treytir, at vit skulu gjalda nakað sjálvir, og rundanum í kommunustýrunum hava teir verið noyddir til at uppseta budgettið óalmindiliga nógv í tíllid til, at nakrir borgarar eru í stand til at bera útreiðslurnar. Kravini til kommunurnar um stór, tað má loytingið ikki læta úti av betraktning.

Tað er eitt gamalt orð, sum sigur, at tað skuhu góð bein til at bera góðar dagar. Tað fyrikemur mær, at tað núverandi løgtingsfloirtalið ikki hevur nógastark bein til at bera teir góðu dagarnar, ið nú eru, og at tað hevur latið seg frøysta av teimum til at seta fyritøkur í verk, sum ikki eru løgtingsuppgávur. Teir rokna við, at teir góðu dagarnir skuhu vara allar ævir, men til tað hevur floirtalspartíið ov svøk bein.

Tað er av orðforaranum blivið sagt umanfyri tingið, at táið forholdini eru so, at vit hava brúk fyri hesum peningi, so áttu bæði sjálvstýris- og samhandsmenn at kunna verið samsintir um at arbeitt hen til at skaffa tann pening, sum nevðugur er. Ja, tað verða vit vist noyddir til. Marks Winther hevur brúkt sonógv orð fyri at fáa budgettið til at glíða niður fyrst í okkum, síðani í skattaborgararnar, og tað kann nokk gerast nevðugt hjá honum at brúka nógv orð. Tað vil vera vanskiligt at fáa hetta til at glíða niður í veljararnar uttan við nógvum orðum. Farmaskipið kostar okkum nógv meiri enn telefonin. Tá vit logdu telefonina, tá hevði tuan givið hopið upp at nakar vildi leggja okkum telefon. Vit máttu gera tað sjálvir, og tí var tað rett, at vit beshuttadu okkum til at gera tað. Tá forholdið verður normalt aftur, so er eingi at ivast um, at vit kunnu fáa skip til brúks sum vit vilja. Hesi ting kunnu tí ikki samanlíknast. Farmaskipið er tað, sum mest kostar okkum og sum útger tann størsta partin av teimum pengum, sum vit hava okt okkara skuld við. Viðvíkjandi fordeilingini av skattinum, so haldi eg eisini, at tað er vanskiligt at fordeila hann so rættvíst, at hvør kann siga at nú er gott býtt. Eg haldi, at novndin her er komin til eitt resultat, sum er so nokurlunda. Ordfinarin heldur, at hovdu vit skattalógina, so hevði tað verið betri, og hann sigir, at skattalógin rovnir at finna skattaovunni. Men eg veit ikki, hvussu rættvíst hon vil virka. Lívið er jú nakað mangfoldigt, so at tað sum verður gjort í skomaform, ikki altíð hóskar so væl. Tær reglur, sum gelda nú, eru meiri plastiskar enn tað skattalógaruppskot, vit samtykktu ífjor. Tað var ikki elastiskt. Eg haldi, at tað er rætt, tá nomm líknar skattin, at hava eitt apparat, sum er nakað elastiskt, so at tað er spalirúm fyri einum skjonni. Tað hava vit nú. Tó nú eg siga, at tað er einki í vegin fyri, at vit kundu ganga inn á procentfliking við tí grundarlagi, vit hava nú. Samhandslimirnir hava undirskrivað álitið við forbehold, og eg havi her greitt frá, hví teir hava gjort tað. Eg skal ikki siga stórt meir, men bert áminna, at og síggi myrkt á viðurskiftini fyri framtíðina. Tá vit eru kommir so langt upp, sum vit eru komnir við omsetspartitiónsskattinum, so eri eg glaður, at vit ikki hava fyritikið fleiri statsfyritøkur enn vit hava nú. Tí skuldu vit havt tað aftrat, so haldi eg, at tað hevði fort til, at Føroyingar fóru undir kong.

M. A. Winther: A. Samuelsen meinti, at eg brúkti nokk so nógv orð, tá eg talaði íáðuni. Um vit skuhu meta, hvor tð brúkar nógv orð, so brúkar A. Samuelsen tjúgu orð, meðan eg brúki tvey orð. Og um eg skuldi ímotigunga A. Samuelsen við tí sama orðaríkidømi, sum hann plagar at brúka, so vildu vit ikki blívu liðugir fyrr enn til allahalguna. Hann segði, at tað eru tvey sjónarmið: Eg (hann) síggi myrkt á viðurskiftini, og Winther sær ljóst uppá tey. — Tað gleðir meg, at eg kann siga, at eg ræðist ikki at fara til nýar fyritøkur, meðan A. Samuelsen er raddur og hopar aftureftir tá hann sær eina nýggja fyritøku. Hesi ítalilsir frá A. Samuelsen forklára fult tann mun, sum er millum samhandsmenn og sjálvstýrismenn. Hesir báðir flokkarnir siggja við ymiskum eygum í ollum forum, og tað er gott, at samhandsmenn sjálvir greiða frá tí munni, sum er millum okkum; tí tað plagar at vera byrjanin til eitt betri lív, at maður sær, hvussu ein sjálvur er. Hví tekur A. Samuelsen ikki og behandlar tolini? Tað sær út, sum at syndirnar liggja á sjálvstýris síðu. Nei, lat okkum siggja hvørt tað fyri seg og vita, hvar samhandssyndirnar eru. A. Samuelsen sigur, at tað hevur verið ein tendensur hjá samhandspartiinum at halda aftur, og hjá okkum at ganga framm. Ja, vit havi ikki viljað vera so sparnir, at vit skuldu noyðast at binda okkara fornuft. A. Samuelsen sigir, at síðsta árið, tá samhandsmenn hevdu fleirtal, var ovirskotið 20,000 kr., og tá sjálvstýrið kom til, so

konu vit í undirskot. Men so mugu sambandsmenn hava tikið pongarnar við sær, tá teir fóru avstað. Annars havi eg leitað eftir hesum yvirskotinum, men eg finni tað ikki. Sakin er, at tíðin kom inn yvir sambandsmenn, áðrenn teir vistu av. Um sambandið sat nú, so høvdu teir ikki kunnað hjálpt sær við tað yvirskot, sum teir tala um. Teir høvdu ikki kunnað reparera sanatoriið ella betalt til vegirnar. Og Smiril? Hevur ikki sambandið verið við til at keypa »Smiril«. Nei, hor sleppa teir ikki soloiðis frá uttan víðari. A. Samuelsen heldur, at sjálvstýrið stendur á veikum beinum. Nei, tað er eingin sum hevur sagið merg úr sjálvstýrispartíinum. Fólk vil sanna, at sjálvstýrismenn hava handlað, sum teir hava átt at gera. Eg trúgvi ikki, at ministaranum dámar okkara skattalóg; men vit vilja halda hana framm kortini. Og sambandsmenn vilja einaferð geva okkum rætt, at tað ikki er farandi longur eftir teimum vegum, sum higartil eru gingnir. Vit kunnu tala um hesar spurningar; men vit koma tó ikki longur, tí okkara sýnspunktir eru heilt misjovn. Um A. Samuelsen heldur fram, hvussu væl sambandsmenn hava dugað, við tað at teirra budgett var so beskrøðið, bert 20,000 kr., meðan vit nú eru uppi í 100,000, so betýðir ein slík agitasjón kanske nakað millum úpplyst fólk, men og raðist hana ikki, tá hon kemur út millum upplýstar menn og kvinnur. Eg atti ikki at taka orðið aftur í hesi sak; so kann A. Samuelsen um hann vil brúka tjúgu fyri hvert orð hjá mær. Vit siggja ymiskt uppá tingini og tað ger seg galdandi her.

J. Patursson: Eg havi ikki talað fyrr í hesi samkonnu í málum viðvíkjandi líggjarviðurskiftum her á tingi. Tað hevur verið orðað um tær stóru útreiðslurnar. Men all lond hava hækkað teirra budgett ógviliga nógv í hesi tíðini. Sjálvandi, táið dýrtíð er, so er ikki bert dýrari fyri tann einstaka mannin at halda hús, men eisini fyri tað almenna. Tað er nú 4 ferðir so nógv útgjald sum áðrenn kriggið, men inntøgurnar eru minni. Í allari teirri tíð, og havi verið tingmaður, hevir verið talað um at fáa tingimum inntøgur. Táið eg var fólkatingsmaður útvegaði eg, at vit fingu hvaltollin, hann gav meira enn vantað var. Eg minnist eisini, at tann fyrrverandi formaður í sambandsflokkinum lugsaði um at fáa okkum meiri inntøgur, og tað sama hevði tann umtalaður, ið sat undan hesum, í umhugsan: hann legði tað fram fyri mær, men mær dámdi ikki tann máta, tí hann tók ov nógv inn í statskassan. Áðrenn flokkaskiftið kom her á tingi, kunnu fleiri stór verk í umbúna, eg skal novna telefonina og sanatoriið. Tá hevði tingið hvalatollin yvir at ráða, men sjálvt um tá var talað um, at honda innlega kundi ikki vara við, so kom hetta ongantíð longur enn í tos; sambandsflokkurin vildi ikki leggja nýggjar innlogur undir tingið. Sambandsmenn hava haft tað lætt, meðan teir hava verið við ræðið. Teir hava haft at ráða yvir hvalatolli, ið væl kann kallast sjálvstýrispeningur; sjálvt um ikki flokkaskiftið tá var komið, so vildi eftir sambandslugsan um skattaviðurskifti tann skattur verið farin í statskassan. Nú vildi so til, at táið sambandsmenn fóru frá at ráða, tá helt hvalatolluin knappliga uppat, við tað kríggið stedgaði allari hvalaveiðu, og har misti tingið 25,000 kr. um árið, sum tollurin gav í góðum árum. Og tað er tað spell, sambandsmenn hava gjørt, at teir ikki í tíð hava fyrireikað aðrar inntøkur. Um teir høvdu arbeitt beint, høvdu teir yvirlátið okkum eina árliga inntøku av 100,000 kr., tað vildi svara til tær 25,000 kr. árliga, løgtingið hevði yvir at ráða, tá teir tóku við ræðið. — Men eigur at gleðast yvir, at vit hava eitt stórt budgett, tí tað vísir, at her er lív í. Eg haldi, at tað vildi verið ódømi, um løgtingið enn hevði haft eitt budgett uppá 35,000 kr. sum áður. Sum ørðforarin hevir vist á, eru eingir av hesum peningum givnir út til ónyttu. Tað er gleðiligt at kunna vísa á, at vit hava latið nógvan pening til vegir, til dampskip, at vit royna at fáa okkum elektriceitet o. s. fr. Hetta er ikki annað, enn hvat ið hevir verið í ollum húshaldum, at útreishurnar eru farnar upp. At vit ongar inntøkur hava nú, kann eg ikki annað enn geva sambandsmonnum skyld fyri.

A. Samuelsen: Ørðforarin sagði til mín, at eg hevði sagt, at allur tann munur, ið var á hansara sýn og mínum, var, at eg sá myrkt uppá tingini, hann ljóst. Tað er ikki beint; eg segði ikki tað, men at hann hevði tendens til at siggja ljóst uppá okkara skattaviðurskifti. Hr. Winther segði, at eg hevði talað ov nógv; tað passar ikki. Hetta er nakað, sjálvstýrismenn royna at billa fólki inn, at táið tingið er so dýrt, so er tað ti eg bróki av nógva tíð til at tala, eg trúgvi ikki, teir fanga nógvar veljarar við hasum. Eg havi ikki talað leingi um hetta, men helst er ein viktug sak, og mun má ikki gloyma, at eg ikki havi fingið tíð til at skriva nakra hugsanking í hesari sak, nú tingið er so langt

útliðið. Hrr. Winther hevir skrivað sína betoukning, men so má eg hava loyvi at ímótiganga honum og greiða frá okkara hugsan um hesa sak. Eg nevndi, at 1. sept. 1917 var 20,000 kr. í kassanum. Eg nevndi tað, tí tað var faktum — hrr. Winther kann benokta tað, um hann vil. Hrr. Winther segði, at í 1918 vóru eingir pongar, so um teir høvdu verið, so vóru sambandsmenn farnir av stað við teimum. Sjálvstýrismenn høvdu haft 2 løgting tá, og tað er nógmikið til at kunna hava forandrað situatiónina ógvuliga nógv. — Tað standa á budgettinum so ógvuligar stórar útreislur til sanatoriið. Eg kann gott forstanda, at tað sær pent út, tá maður kemur við hesum stóra budgetti, so at kunna vísa á, at tað stendur so nógv uppført til sanatoriið, at allir hesir pengar eru til tey neyðar sjúku — og sjálvandi — sambandsmenn skulu hava ansvarið av, at alt er í órøkt — men hasir pengar eru nógv ov nógv til rentur og avdrag av sanatoriinum. So er tað útreishurnar til elektricitetsmálið. Har er nú í ár fyritikið undirsøkilsir, sum fyri 2 mánaðir kostaðu okkum 20,000 kr. Tey skulu tekast upp aftur næsta ár, og eftir tí og veit, vil tað taka fleiri ár, áðrenn liðugt verður, so vit verða ikki standandi við hasar útreishur. Hatta hava sambandsmenn ikki verið við til. Vit vildu hava upplýsingar um elektrisk anlegg og forhandling við ministaran. Í staðin fyri fór ein kommissión til Noregs, ið kostaði nógvar pengar; tann kommissión bestóð bert av einum manni, ið beint nú fór út av durunum. Hann ferðaðist viða í Noregi, eftir hvat hansara berættning sigir, og kom aftur við 3 ingeniørum. Forhandlingarnar við ministeriið, ið tingið ynskti, hava innskrenkað seg til, at hesin sami kommissiónslimur hevir hatt eina samtalu við justitsministaran. Tað var ikki tað, tingið meinti við, at vit skuldu føra forhandlingar við ministeriið, um tann besta máta at seta hetta í verk uppá.

Eg havi eingi ansvar fyri tí stóra skipakeypinum og hvatið »Snurlie viðvíkur, so finnst hann ikki á hesum budgetti; hann hevur mann ikki lov at nevna í hesum forbindilsinum. Heldur ikki tað munnliga referatið vil eg hava nakað ansvar fyri. Vit hava forrestin ikki fingið tað enn — ja, tingmonnunir hava ganska vist fingið hvør sítt exemplar, men fólk hava eingi fingið. Og tað hevur onnið fört til, at vit ikki hava fingið sakreferatið haldur. Tað er meira beklagiligt, tí tað munnliga referatið gevi eg ikki stórt fyri — tað inniheldur ikki annað enn hvat nakrir referentar siga, hvat vit skulu hava sagt, — men sakreferatið inniheldur aktstykkini — tað er nakað, sum dugir. Sjálvstýrismenn hava ikki kunnað mótstaðið frogatingina, nú teir eru við fati og hava hildið so nógvar pengar vera úti millum fólk, at smyrja uppá so tað forsleer. Men tað kemur aftanum aftur. Tað hava altíð verið ringar og góðar tíðir og tað er eingin grund til at trúgva at tær ringu skulu útiblíva. Og tá situr løgtingið við øllum hesum útgiftum, borgarnir hava ikki ráð at betala skattarnar, teir hava annað at brúka pengarnar til. »Hesar 100,000 kr. er alt, sum landið biður um, sigur ørðføraríu. Tað er kanska rætt, men so eigur hann eisini at minnast, at í 1 ár hava vit hevað okkum frá 18,000 kr. til 100,000 kr., — skulu vit blíva við at stíga við hetta lag, so koma vit skjótt uppí fleiri 100,000. Teirra ljósa sýn vil ikki forláta teir, teir fara at blíva við at leggja byrðir á løgtingið — tað skulu Føroyingar betala! »Hatta er gott agitatiónsstoff fyri óupplýstum fólkis, sigur Mads Winther um tað, og havi anført. Men tað er ikki annað enn faktum og tað havi eg væl lov at nevna. Hví sær Mads Winther forrestin so myrkt á agitasjón? Hr. Winther hevur jú eisini roynt seg sum agitator. Hann upptræðkar mínst so agitatorisk sum eg. Hvussu hevur hann ikki í síuari tíð agiterað við øllum teimum tómu sambandskassunum, skuldunum, vit høvdu pádrigið løgtinginum, øllum óbligatiónum, vit høvdu pantsett o. s. fr.! Men sakin er tann, at tá *nú* agitera, so bestendur agitasjónin í, at vit fyritaka eitt upplýsningsarbeiði í tí føroyska fólkinum. Eg havi verið við í hesum upplýsningsarbeiðinum til hetda dag og eg vil bliva við í tí soleingi eg orki. Tvíð harímóti Winther og hansara menn agitera so gongur tað út uppá at geva fólki bind fyri eygum. Tað upplýsningsarbeiði, eg og nógv partí gera, er eitt gott arbeiði.

»Øll lond, øll ríkini, meinti hrr. Patursson, »setta sína budgettir upp nú á dagunum. Ja, hetta er nøkkupp óhukkan: vit vilja skapa okkum og spæla stat. Uttan um okkum liggja samfund, stór samfund, sum fyritaka sær tað og tað og alt kostar tað nógvar pengar. Tað vilja ynskir lingmenn, at vit skulu eftirlikna. Her hevur tingmaðurin úr Kirkjubø altíð gingið á oddа. Men vit vilja ikki fylgja teimum. Lat Ongland, Noreg, Ameriku gera, hvat tey vilja og okja sínar budgettir, vit ætla ikki at apa okkum eftir teimum. Slíkt er óðamannafos.

Tað hevur altíð verið talað um at

fáa meira inntøku til løgtingið, sigur tingmaðurin úr Kirkjubø: »Formaðurin í samhandsspartínum, prást Petersen, spekuleraði í sínari tíð yvir, hvussu nógv vit kundu fáa inn í tolli.« Tað er heldugt fyri Patursson at prást Petersen er deyður. Hevði hann sitið har sum hann átti, á tí stólinum næst við har sum Patursson eigur at sita — men hann situr har sjáldan, hann er sum oftast úti — so hevði hann lættliga gjørt hr. Patursons orð til einki. Og viss fyrrverandi amtmaður Rytter hevði verið her, so hevði hann nokk haft hug at korrigera hr. Patursons úttalilsir. Nú kann hann saktans standa her og fortelja okkum, hvussu prást Petersen spekuleraði uppá toll og amtmann Rytter spekuleraði uppá at draga tær flestu inntøkur inn í statskassan. Tað er merkiligt, at tingmaðurin úr Kirkjubø ikki hevur funnið anleidning til at fortelja tað fyrr enn nú, tá hin eini maðurin er deyður og annar farin av landinum. Eg tori ikki at trúgva hesum søgum.

Tingmaðurin úr Kirkjubø hevur so oftu og aftur nú tikið til hvalatollin og tær inntøkur, hann gav av sær — 20—25 - 30,000 kr. sigur hann. Tikið gjøgnumsnittliga passar einki av hasum tølum. »Hetta vóru sjálvstýrisinntøkurnar sigur hann so. Eg vildi gjarna vita, hvar uppá hann grundar tann pástandin. Tað fái eg nú ikki at vita, tí hann er desverri ikki tilstaðar; hetta er siðurin hjá honum; táið onkur tosar ímóti honum, so plagar hann at rýma. Hvar hann nú er, veit og ikki; kanska er hann heimfarin, kanska hann er úti í forstovuni. Viss hann var her, so vildi eg spurt hann, hvussu hetta kundi vera sjálvstýrisinntøka, tá einki sjálvstýri ella samband var til. Annars er hesin hvalatollur einki at blíva við at reypa av; tað var neppa so heldugt at vit fingu hann. Tí fyri hvørja krónu vit fingu inn í tolli mátti tað føroyska fólkið bokala 2 kr. aftur til Norðmenningar fyri tvøst. Føroyingar goldu allar hesar pengar sjálvir og meira enn tað.

»Í øll teyár sambandsmenn ráddu løgdu teir ikki eitt oyra inn í nýggjum inntøkum til tingið« sigur tingmaðurin. Nei, tað var ikki avgerandi fyri okkum. Okkara uppgáva var at halda útgiftirnar niðri og lata pengarnar verða, har teir áttu at vera, í lummanum á skattaborgarunum, til vit fingu brúk fyri teimum.

Tingmaðurin í Kirkjubø kann forstanda, at tað ikki eru vit, sum eru skyld í at skattalógin ikki er blivin samtykt. Men vil væl ikki sikta okkum fyri at hava ministarnn í lummanum, so at vit kundu seta hann treytir fyri. Sjálvatýrismenn hava ikki fingið sína skattalóg igjognum, tí ministarin sigur, at teir ikki hava dugað at geva hana hampiliga frá sær. Patursson skuldi heldur vera glaður um, at budgettið var stórt, tí smá budgett betýða stagnation, stór budgett betýða framgongd. Eingin vil tó kunna pástanda, at tann umstendigheit, at amtsrepartitiónsfondið hevði havt eitt lítið budgett ífjor, betýðir, at Føroyar eru stagneraðar. Um man pástandur tað, so er einki í tí. Eitt stórt budgett betýðir ikki absolutta framgongd. Men tá status er góður ella tohuligur, so standur tohuliga væl til. Í stundini er status ringur. So sigir Patursson, at tað er gott, at vit hava fingið nakað til vegir. Men hvør er tann tingmaður, sum fyrst nevndi, at man skuldi hjálpa uppá arbeiðsloysi við at gera vegir? Tað var ikki Patursson. Hvíðsgrundin til, at vit vóru komnir inn á vegmálið var fyri at avbøta arbeiðsloysi.

J. Poulsen: Jeg har, da der var Tale om Paaligning til Amtsrepartitionsfonden, tydelig udtalt det uheldige i, at Skatten er stadig stigende fra et Aar til et andet. Jeg har udtalt mig saadan af Hensyn til Kommunerne. Kommunerne skal selv styre deres Anliggender, og dette skal de have Penge til. Og der foreliggor jævnlig Andragende om Tilskud til et og andet. Der tales saaledes om Ansættelse af flere Lærere. Men jeg tænker mig, at hver Gang et Forstanderskab indstiller i den Retning, saa har man siddet og regnet ud, hvad det koster og overvejet, om man kan udrede sin Andel af det. Nu foreliggor Andragende om Støtte til Skolebygninger, og saa kommer vi her og paaligner dem en Skat, som er fire Gange saa stor som før. Forpligtelserne vokser stadig, og naar der ikke kan være nogen Stabilitet i, hvad de har at betale til Amtsrepartitionsfonden, saa kan de ikke gøre nogen Beregninger. Og det er mulig, at Skatteforhøjelsen til Amtsrepartitionsfonden endnu ikke har naaet sin Højde. Jeg vil gøre nogle enkelte Bemærkninger om Paaligningen. Ordføreren oplyste, at der er taget Hensyn til der, hvor Fiskerskibene havde hjemme, og at der har man sat Beløbet højt. Dette er naturligt. I Aar har Hjerne af Fiskerskibene tjent Penge. Der er intet af indvende mod, at forskellige Steder er komne temmelig højt op i Paaligningen. Men f. Eks. Nes Sogn synes at være sat forholdsvis alt for meget op. Der er ingen Fiskerskibe, men der bor jo nogle Skibsførere og muligt ogsaa

Parthavere i Skibe. Dette Sogn er blevet paalignet 1400 Kr. — Ellers var der enkelte Tal, som faldt mig i Øjnene saaledes, at Kvalvig skal have efter Skøn 651 Kr., medens Kollefjord med samme Folketal kun har 240 Kr. Det kan være, at Folk har fuldt saa godt Raad i Kvalvig som i Kollefjord. Men at der skal være saa stor Forskel mellem disse to Bygder i Sundelaget, kan jeg ikke godt se. Kvalbø er sat til 880 kr., medens Porkere har faaet knapt 400 kr.; men det er muligt at Udvalget har sine Grunde derfor.

S. P. úr Konoy: Tað sum J. Poulsen flytur framm, er athugavert. Tað er nakað sum hvør maður í landkommununum má sanna. Menn sum sita á bygd, verða illa við, at løgtingið gongur so høgt við líkningini. Og tað kann forstandast, at løgtingsmenn yvirfyri veljarnum ikki vilja gera so knøpplig lop upp eftir. Tað hevur eisini víst seg, at kommununar hava roynt at gera tað minst møguliga fyri ikki at fáa so nógvan skatt. Í hesum kunnu J. Poulsen og eg fylgjast. Men mær tykir, at J. Poulsen skuldi koma við einum eftirsetningi. Tað forkerta er, at løgtingið ikki hevur fingið sínar skattir inn á annan hátt enn aðrir kommunukassar fáa tað, so at fólk virkiliga kann síggja, hvat mann skattar til løgtingið og hvat mann skattar til kommununar. Hettar tonkti eg ífjør, tá eg stemmaði fyri skattarlógini. Tað var betri, at fólk fekk at vita, hvat kommununar skatta og hvat løgtingið skattar til sítt egna formál. Men vit mugu finna okkum í hesum til vit fáa ein annan ordning. At almindiligir menn vilja vera ímóti hesum, er rætt nokk. Men teir sum sita í tinginum og kommununum, mugu siga nakað annað. Gøtusókn hevur 810 fólk og kann nú ikki noyðast við eitt minni árligt budgett enn 5000 kr. Síni formál skal hon fremja. Men tá er tað ikki undarligt, um heila tingið krevur 100,000 kr. Eg eri einigur í hvussu óhelduga hesin skattamátin virkar sum vit hava. Løgtingsskatturin eigir at vera fyri seg og kommunuskatturin fyri seg; tí at stogga við løgtingsuppgávunum kunnu vit ikki, og stogga við kommunu-uppgávum kunnu vit heldur ikki. Íbúgvararnir í eini sókn meina, at tað er kommununmonnunir, ið leggja hendan skatt á teir, tó at tað er løgtingið. Men einaferð fáa vit vael broytt okkara skattalóg.

J. Poulsen: Om vi kommer til at ordne Skattemaaden anderledes, vil det dog ikke hjælpe paa Skatteydernes Penge.

S. P. úr Konoy: Har eru vit ikki samsintir, tá hrr. Poulsen meinar, at vit skulu verja um peningapungin. Eitt samfund, ið tekur sær uppgávur uppá, má nýta pening; eitt primitivt samfund tekur ongar uppgávur upp. Peningur má til. Men so er spurningurin, hvat er tað løgtingið krevur og hvat krevja forstandarskapini.

Edv. Mortensen: Tingmaðurin á Strondum framheldur, at táið løgtingið hoðkar líkningina til amtsrepartitiónsgrunnin, so kann tað koma sum eitt yvirraskilsi fyri kommununar. Ja, tað er beint, men tað er eisini tað, vit vilja koma burtur frá við at fáa eina modernaða skattalóg.

H. C. W. Tórgarð: Jógvan Poulsen nevndi, at hann hevði einki ímóti vissum plássum sum t. d. Havnin. Táið vit skulu tala um, hvussu skatturin er fordeildur, kundi nevndin hava verið eitt sindur heldugari til at útfinna, hvar skattaevnan er til staðar. Tað er einki nýtt fyri Havnina at vita sær, at man hevir staðið væl so høgt í skattalikning til amtsrepartitiónsfondin, men so kundi tað eisini verið gott at fáa passandi part í teim extra inntøkum, tær einstøku kommunur hava av løgtinginum, men tað er ikki so. Tað kann invendast, at Havnin hevir so stórar skattagevarar, at ein stórur partur av skattinum kemur at falla uppá Havnina; men man kann væl hugsa sær pláss her í Føroyum, hvar tað finnast størri skattagevarar og hvar skatturin uppá seg er væl minni. Man kann siga, at hetta er ringt at fáa í eitt gott lag, tí man má fyrst vísa á, hvørji pláss skuldu hava fingið meiri skatt. Men táið Havnin er líknað í 12,000 kr., og eftir fólkatalinum skuldi haft 4000 kr., men eftir løgtingsins skjønn hevir fingið 8000 kr., so er hetta órættvist samanborið við bygdir við stórari fiskarínntøku bæði sunnanfyri og norðanfyri. Tað eru nógvar stórar fyritøkur her á landi, hvar tað verður krav, at Havnin skal geva stóran studning, meðan Havnin aldri verður styðjað av løgtingskassunum.

R. Nielsen: Táið Tórgarð kom fram og talaði fyri sínum sygu Modera, sum tey siga, so má eg á nevndarformannsins vegna siga, at Havnin er ikki sett meira í skatt enn hinar kommununar eru. Skatturin er órættvísur, ja, tað viðgangi eg, tað er rætt sum Tórgarð sigir; men hann hevir ikki verið við til stemmin fyri einari rættvísari skattalóg, so tað er hansara egna

skyld, at vit eru noydast at skatta eftir hosari gomlu ótjenligu lógini.

H. C. W. Tórgarð: Ja, og vantaði altíð at fáa eitt líknandi svar hóast R. Niclasen nøyvan meinti »nin syge Modere, men vel holdur »Mostere. Eg nevndi, at nevndin kundi hava verið heldugari, og orðførarin nevndi, at tað vóru fleiri bygdir, hvar einki hevði verið at finnast at líkningini, hár ímillum Havnin, tí talaði eg at.

S. P. úr Konoy: Eg vil spyrja Tórgarð, hvat tað er fyri byrðir, sum Havnin hevir, ið bygdirnar ikki hava. Havnin hevír teir stóru embætismennirnar, teir eru góðir skattagevarar — umframt at teir eru eitt prýði fyri býin — — Havnin hevir raalskúlan, bankan, sparikassan o. s. fr., og umframt ongan jarðaskatt.

H. C. W. Tórgarð: Hrr. Konoy nevndi ymsar stórar skattagevarar í Havn; ja, hatta má Havnin ofta hoyra, men man ikki langt betri skattagevna vera í nongum bygdum utanfyri Havnina? Eg skal ikki rokna upp, hvat Havnin hevir av serligum byrðum; eg nevndi ikki orðið byrði; og segði, at Havnin fyri egna rokning setti fleiri arbeiði í verk, sum aðrar bygdir krevja stuðning frá løgtingi til, serliga vegarbygging o. t.

M. A. Winther: Eg vil siga, at eg altíð havi hasft eina góðsku fyri Havnini, og eg havi hana enn. Eg meini, at vit eiga at fjálga um Havnina, tí har skulu vit hava okkara centrum. Viðvíkjandi hesum 1000 kr., sum man kundi sett Havnina niður í skatt, so botýðir tað einki. Men um Havnin skuldi betalt eisini tann lutapart, ið býtist út á jarðagóðsið, so vildi Havnin betalt 5000 kr. meira. Viðvíkjandi repartitiónini kunnu tingmenn jú framseta broytingaruppskot; sakin kemur jú til 3. viðgerðar. Eg plagdi í gomlum dogum at sláa eitt slag fyri Havnina, men ongantíð fekk eg viðhald her á tingi: eg setti fram broytingaruppskot, men tey vóru ikki samtykt. Tað verður vel tað sama nú. repartitiónin er eitt skjønn, og tað verður altíð óretthvist. Annars verður tað jú so við oinnu tjaki um reparbitiónina, at um tað skal nytta nakað, og man skal kunna fáa skattin minkaðan fyri onkra kommunu, ið hevir fingið ov nógvan skatt, so má man vísa á onkrar aðrar kommunur, sum skatturin kann leggjast yvir á. Tann samlaði peningur skal jú vera tann sami.

M. Samuelsen: Winther helt, at tað kom einki burtur úr at diskutera um amtsrepartitiónina, tí man mátti kunna vísa á, hvørjar kommunur høvdu ov lítlan skatt, so tað kann javnast út aftur, um onkur hevir fingið ov nógvan. Tað var nevnt av einum manni, at Hvalvík sókn hevði fingið ov nógvan skatt. Ja, eg haldi eisini, at Hvalvík sókn er ógvuliga hart belastað; har er líknað eftir skjønn 651 kr., meðan Skopun hevir 279 kr. eftir fólkatali. Har má vera eitt misforhold. Eg ætlaði at gera ein serdeilis bemerkning við Saxun, men har siggi eg, er skett ein forandring við uppskotinum. Saxun er eitt pláss, ið einki hevir av sjónum, og í ár hava teir einki av landinum heldur; har eru menn, sum í ár hava einki slakt, so teir eru rættiliga illa stillaðir til skattaevni í ár.

M. A. Winther: Hatta er beint sum M. Samuelsen segði, og eg skal leggja aftrat, at tíð tvær kommunur hava fingið væl so nógvan skatt, Hvalvík og Funningur, so er tað væl frá teirri tíð, tá har vóru hvalastøður, men eg vil ráða til, um M. Samuelsen framsetir broytingaruppskot um at minka skattin fyri hesi pláss, so at leggja hann yvir á tey pláss, ið hava tey nógvu skipini.

Fundur mánaday 22. september.

Elektricitetsmál.

2. viðgerð.

...

A. Samuelsen: Viðvíkjandi kommissiónsafferini sakni eg eitt uppskot, sum gongur út uppá at gera Patursson sum kommissiónsformann ansvarligan fyri at vit hava forkhudrað sakina betýdiliga. Vit hava fingið fleiri ingeniørar og fingið tað heila alt ov dýrt. Patursson má vera ansvarligur fyri tað, hann hevur gjørt. Eg eri glaður, at minnitalið fyrisær at leggja sakina fyri ministaran; men hitt átti at vera aftrat. Vit mugu fráleggja okkum ansvarið. Eg havi einki uppskot sett; men allir, sum ikki vilja bera ansvarið, mugu fráleggja sær tað. Kommissiónin hevur brúkt 100 kr. um dagin og tað er nokk so nógv, tí tað dreiar seg um átta dagar. Men um pengarnir vóru vel anvendir, so var tað nakað. Eg havi tilláti mær til

minnitalsuppskotið at stilla eitt broytingaruppskot. Tað gongur út uppá tað, sum eg var við til at stilla broytingaruppskot um, tá sakin var fyri í vár. Vit mugu beina hosa sak í eitt annað spor, um tað hon er komin inn á. Staturin má styðja okkum við garanti soleiðis, at tær sóknir sum vilja hava elektricitet fáa hendan studning. Tað uppskot, sum eg havi fyrisligið til punkt 5 til sakina A -- bokstavirnir eru ikki so greiðir — gongur ut uppá at stilla tær kommunur, sum vilja gera nakað við hetta mál — Havnar kommunu og aðrar kommunur, eisini Vágarnar og Vestmanna — soleiðis, at tær fáa ein tjans, so at ikki privatmenn taka keldurnar frá teimum. Eg havi tí meint, at tað er rætt at spyrja hesi forsamlingarskapini, um tey ikki halda, at tey vildu útnytta vatnkraftina, um vit kundu skaffa teimum pengar. Her er talan um eitt privat selskap, sum einki kann gera uttan við pengum frá statskassanum. Hví kunnu kommununar í Vágum og Vestmanna ikki líka gott sum hetta selskapið útnytta Seyrvágsvatn og Fossá? Tingið eigir at spyrja hesar kommunur, um tær ikki sjálvar vilja útnytta hesar kreftir, um vit skaffa teimum pengar. Befólkningurin í Vestmanna er fyri, at skal tað gerast nakað, má tá vera kommunan, sum skal fyritaka tað, so at Fossá verður á Vestmanna hondum. Vit í tinginum eru pliktigir til at hjálpa kommununum í hesum plássum til tað sama sum tingmenn vilja hjálpa einum privatum selskapi til. Tað er tí, at eg vil stilla uppskot til punkt 6 og vóni, at tingið vil samtykja tað. Tað er eingin meining í, at vit skulu bereva kommununum rætt til at útnytta sína vatnkraft og fyrr ella seinni vil tað svíða til okkara, til kommununar og til tingið. Orðførarin fyri fleirtalinum sigur, at hann í hesi sak hevur konferarað við ministaran og hann sigur, at tað frammgekk av tí, at hann hevur fingið nakrar pengar at ferðast við í Noreg. Einhvor víksdagsmaður, sum sigir, at hann vil gera ferð í offentligari interessu, hann fær pengar til tað, sjálvfylgiliga. Teir flestu nýtast ikki at fara til ministaran, teir kunnu fóa pengarnar á annan háttt. So sigur orðførarin, at um mann hevði gingið framm sum Effersøe meinti, at man skuldi gingið framm, so vildi mann koma inn í sama suppu sum í sini tíð, tá mann fekk ingenior Møller higar. Tað er rætt nokk, at vit fingu kápulin lagdan har sum botnerin var minni góður. Men tá Møller var her uppi, so var hann sterkt uppreklamerandur av tingmanninum í Kirkjubo. Síðani hevur mann ansgrigið hann, tí hann var ein danskur ingeniorur. Vit hava haft norskan ingenior, sum hevur undirsøkt í Vestmanna og Vágum, og tað er ikki onnur enn so, at nú skal hann aftur undirsøkja har. Tað týðir ikki á, at hesin maður er so ógviliga gloggur. So sigir orðførarin, at tað var undarligt av Effersøe nú at koma við hesum, aftaná at tingið hevði samtykt at ordna hendan spurningin á ein góðan hátt. Eg var ikki við at stemma fyri tí. Eg havi forstaðið stillingin soleiðis, at um mann beslutar at ganga tann vegin at lata hetta selskapið fyritaka annlegg, so vilja vit ordna tað á henda hátt. Eg gangi út frá, at minnitalið hevur forstaðið tað soleiðis. Tað kann vera, at minnitalið hevur rætt fleirtalinum sin fingur, og fleirtalið er kannske til reiðar at taka allu houdina. Men minnitalið er ikki gingið viðari, enn um ein betri ordning kemur, so stendur minnitalið aldeilis frítt. Tað skal ikki hukkast tingmanninum úr Kirkjubo at siga, at løgtingið hevir bundið seg til at styðja fossafelagið í Vestmanna, soleiðis havi og ikki uppfatað sakina. So tosaði tingmaðurin úr Kirkjubø um, at tað var undarligt, at her var so nógv tos, um at hann hevði brúkt 1000 kr., og at tað var bíligt ímóti hvat hrr. Effersøe hevði brúkt til at fara fyri til Keypmannahavnar fyri at vitna, tá hann var stevndur fyri landstingskommissiónini. Nú er hrr. Effersøes samfundsuppfatilsi og mítt samfundsuppfatilsi ordvísi enn hrr. Paturssons. Vit halda ikki nan kann nokta at vitna, sum menn her í Føroyum hava gjørt. Men hevir hrr. Effersøe verið so dýrur sum hrr. Patursson, so verður tað ein stór útreisla. Hrr. Patursson var 10 dagar í Noregi, tað var 100 kr. um dagin. Hrr. Effersøe var burtur úr Føroyum í 80—90 dagar; hevði hann brúkt 100 kr. um dagin, so vildi tað verið ein tung byrði fyri teir ið skulu betala, men hrr. Effersøe hevir ferðast so bíliga sum møguligt, hansara ferð hevir ikki verið nakað tilnarmilsisvís so dýr sum honda ferð, tá ein kommissión, ið bestóð av einum manni, fór til Noregs. So sigir hrr. Patursson: hvat hevir tað at týða, um vit geva 50,000 kr. fyri hetta undirsokilsi, táið okkara áir eru á 4-5 milliónir vordar? Eg veit ikki, hvat tær eru verdar, men eg veit, at hetta undirsokilsi verður nógv dýrari enn 50,000 kr. Tað undirsokilsi vit hava haft, hevir kostað minst 30,000 kr., og tað vil kosta neir enn, sum rokning ikki enn er komið uppá: nú er meiningin, at menninir skulu taka við aftur frá várinum aftur, og tað er ætlandi, at teir verða ikki

lidnir naesta ár heldur; og verða teir ikki lidnir naesta ár, so verður ikki útreistan 50,000 kr., men hundrað túsund av krónum. Tingmaðurin úr Kirkjubø hevir borið seg aldeilis óforsvarliga at við at antaka hosar monn utan at spyrja teir, hvat teir skuldu hava fyri teirra arbeiði; um tað var eitt arbeiði fyri hann sjálvan, hevði hann verið meira forsiktugur, men hetta eru offentligir pongar. Eg meini, at tað saknast eitt punkt í útvalgsbetonkningini, nemliga, at man skal gera tingmannin úr Kirkjubø og hin útvalgslimin við ansvarligar fyri hetta stóra honorar. Tað kann vera, at eg fái leiligheit til eina ferð enn at koma inn uppá sakina. Áðrenn eg seti meg niður, vil eg biðja tingmenn stemma fyri uúmum broytingaruppskoti, so er lað vón um, at unkað gott kann koma burtur úr. Eg talaði við fleiri í finans útvalginum, og eg hevði ta bestemtu meining, at tað einki vildi vera í vegin fyri at fáa studning frá statinum til kommunal anlegg, og at allar vanskoligheitirnar eru komnar av, at man hevði boteinkiligheitir við at favorisera hetta privata selskap. Eg havi einki ímóti, at man hevir eitt serligt innstillingspunkt um Vág, men eg vil gera uppmerksomt uppá, at tað innstillingspunkt ikki er skrivað á tí máli, ið justitsministarin krevur í einum brævi, dagsett 22. jan. 1919, hvar hann sigir frá, at tey skrivilsir, ið verða send frá løgtingi til hansara, skulu vera skrivað á donskum máli. Um hetta punkt, ið her stendur um Vág, ikki skal fyrileggjast ministaranum, so er tað virðileyst, og táið ministarin sigir, at, táið tit heita á meg, so heitið á meg á einum máli, sum eg kenni, so haldi eg, vit eiga at gera, sum hann biður. Vit mega enn halda, at táið vit skriva til ministaran, so hava vit enn líka stóran rett til at skriva danskt sum føroyskt. Mar dámar líka væl, at man skrivar føroyskt sum danskt, men eg haldi, at táið her er tala um at hjálpa Vág, og ministarin hevir kraft, at innberættningar til sín skula vera á donskum, so haldi eg, at hetta innstillingspunkt skuldi verið á tí máli, ministarin krevur. Eg haldi, at øll betonkningin átti at vera skrivað á donskum. Hin dagin, tá betonkningin viðvíkjandi ingeniør Wedén var fyri, segði amtmaðurin, at hon var bert beroknað fyri løgtingið, og hon var skrivað á donskum. Men honda, ið skal niður til ministeriið, er skrivað á føroyskum. Eg trúgvi nú, at betonkningin viðvíkjandi bruvinum frá Wedén, tá ið alt kemur til alt, er beroknað ikki bert til løgtingið, og eg trúgvi, at hon fer viðari, og at hon verður brúkt. Sjálvt um ikki amtmaðurin sendir hana niður, skulu aðrir nokk syrgja fyri, at hon kemur niður til Danmarkar og at hon verður útnyttað, og eg vanti, at um eg komi til Danmarkar sum ríkisdagsmaður, so vil eg harniðri treffa betonkningina viðvíkjandi Wedén.

R. Nielsen: Orðfarin hevir greitt frá nevndarálitinum, og eg kann í ollum slutta meg til hansara orð. Táið eg kortini biði um orðið, er tað av tí broytingaruppskoti, sum A. Samuelsen hevir framsett. Tað er klárt, at tað heila hann meinar við tí er, at tað eigur at vera innleitt eitt kriminelt undirsøkilsi og fylgjandi straffur. Men hví nevndi hann bert Jóannes Patursson? A. Samuelsen mátti vita, at har var ein maður í nevndini, ið stillaði seg heilt solidariskan við Jóannes Patursson, og tað var R. Nielasen, og eg vil taka alt ansvar við. Eg veit ikki, at J. Patursson hevir gjørt annað enn hvat ið hevir verið beint yvir fyri Føroynum og til landsins gagn. Eg vil standa saman við J. Patursson; vit hava gjørt alt hetta til besta fyri Føroya fólk og land, og hava gjørt hetta fult út eftir sambandsflokksins samtykt. Tórgarð kom inn uppá nakað, ið fyrr er komið fram. Hann hevir aftur í dag fort fram, at tað ið er sagt um útvalgsarbeiðið, eftir hansara meining ikki var yvireinsstemmandi við, hvat ið gjørt var. Tórgarð er fullvæl vitandi um, at útvalgið í sínari heild væl visti, at ætlanin var at gera eina ferð til Noregs, og hann fekk at vita, at nú var leyligheit til at fara til Noregs, og tá hevði hann góða leyligheit til at protestera, men hann sanktionoraði og vildi sjálvur vera farin við, um hann hevði fingið fart, ið hóskaði fyri honum. Hatta kunnu Tórgarð ikki utan um, at soleiðis hevir hansara støða verið í nevndini, um hann nógso nógv vil nokta tað. Tórgarð hevur ikki einans góðkent, at Patursson skuldi fara til Noregs, men ætlaði sær eisini sjálvur við — tað kann hann ikki fráganga. Eg kann hvat øygnablikk tað skal vera púvísa vitnir um, at soleiðis var okkara samráð og avgerð, at Patursson skuldi fara til Noregs. At Tórgarð ikki fór, tá til stykkis kom, verður hansara sak. Hann hevur altíð sanktionerað hesa viðtoku á ollum teimum møtum, hvar eg havi verið við. Tað var kuns eitt mótí at Tórgarð ikki var tilstaddur. Patursson hevur aldeilis ikki antikið hr. Blauuw einsamallur, tað er ein ósannheit. Tað er nógv í heila tikið óforstáiligt, at Efforsoo kann boskylda Patursson fyri tað. Hetta spursmálið um at antaka hr. Blauuw var fult

diskuteraÐ okkara millum, — hitt er reint út sagt ósannheit. Vit hildu seinasta møti um hetta t. 22. mai; Blaauw varÐ fyrst antikin t. 24. Eg leggi annars ikki í at taka punkt fyri punkt av tí, hr. Effersoe hevur annførk, taÐ er neppa eitt punkt sum er sannheit. Nú fyrisitr Andrass Sámalsson tann endring, at tingið góðkennir, at sakin verður leitt inní eitt annað spor og sigur m. a., at hetta selskapið vil taka kraftina frá Vágamonnum. Vit eru í fullstendigum yvireinstemmilsi við allar ognareigararnar her um at lata teir fáa alla ta kraft, teir hava brúk fyri — og havi aldri hoyrt slíkt framsett av forstandarskapunum í Vágum. Tað einasta rætta grundarlagið er tað, vit byggja uppá nú. Hetta er ein fortvívlaður útvegur, Andrass Sámalsson nú royndir til at forbindra at tað skal koma til útførilsi, tað sum nú er fyriskikað. Um tað er tilfeldið at sambandið hevur bygt sín politikk síðani 1906 yvir Paturssons virkan uppá eitt so ósannferdugt grundarlag sum tað í hesum minnitalsbetonkningi, so er tað nógv betur, at sambandsmenn tiga og fara til hús og skamma seg.

J. Patursson: Seinasti ræðarin hevur ávíst, hvussu skeivt minnitalið er farið fram í síni óførnu atfinning móti okkum. Eg skal nerta við, at Tórgarð fanstak, at eínki er samtykt frammanundan við Blaauw um løn; hetta er heldur ikki beint. Eg skrivaði til hann um hann skuldi verið viljugur til omod passende Godtgørelsen at pátaka sær hetta arbeiði og til tess svarar hann so: »Godtgørelsen for dette Arbejde vil staa i Overensstemmelse med de norske Ingeniørnormer; kun vil jeg udtrykkelig nævne, at Rejseomkostninger blir mig at godtgøre efter samme Forenings nugældende Takster«. Ørslitið kom jú ikki at fyriliggja fyrreen nú aftaná Ólavsoku; Blaauw sigur í sini innberetning, at hann ikki hevur hildið seg til teir norsku ingeniørnormirnar, men hevur sett teir væl niður: meðan teir vanligu taxtirnir eru 300 kr. fyri verkfrøðisdag + 30 kr. í kostarhald + reiðskapsslit, hevur hann ikki roknað sær meir enn 66 kr. 60 øyr + 15 kr. um dagin í kostarhald. Soleiðis fyrileggur hesin spurningur: hvin kann neyvan sigast at vera ovlog mett eftir útlanda-verkfrøðislon, og arbeiðið er óivað væl gjort.

So sigur Tórgarð, at eg havi ikki sent honum nakað brev viðvíkjandi tí íslendska verkfrøðingunum og samarbeiði milium hann og Blaauw. Brevið var ikki beinleiðis sent til Tórgarð. men eg skrivaði til Blaauw fyrst soljóðandi: »Væl Deres Ankomst til Thorshavn bedes De straks opsøge Byraadsmedlem, Lagtingsmand, Medlem af Vandkraftskommissionen, Hr. H. Tórgarð og forevise ham mine Skrivelser til Dem, samt fra ham og Hr. Niclasen modtage den nødvendige Vejledning for Paabegyndelse af Deres Arbejdes. Seinri sigi eg í einum bøðum bræv: »Da De meddeler mig, at Skib gaar fra Borgen primo Maj, vilde det være det bedste, om De tog til Færøerne allerede med denne Baad. Der er nemlig nu paa Færøerne en islandsk Ingeniør, engageret af Thorshavns Kommune, som rejser tilbage til Island med »Botnia«. Da det som af Dem og Vasdragsdirektøren anført vil være det heldigste, at alle de færøske Anlæg kan komme ind under en fælles Landsplan, vilde det i Færøernes almene Interesse være af Betydning, at De fik talt med vedkommende, saaledes at han, om' ønskeles, kunde samarbejdet med Dem, de Dage han endnu har tilbage, forinden sin Afrejse til Island, hvis han ikke er optaget andetsteds. Det kunde maaske endda have været fornuftstjenligt at forhøre, hvorvidt vedkommende eller en anden af vedkommende tilraadet Ingeniør vilde være villig til at samarbejde paa Planen i sin Helhed«. Mann kann herav síggja, at vit hava tikið øll mogulig hensýn.

Nú hevur Andrass Sámalsson sett fram broytingaruppskot til pkt. 5, sum sigur, at tingið biður um almannan ríkisstuðning til alt, hvat gerast skal av ravnagnsverkum í Føroyum. Hetta fer ikki at bera til. Áðrenn vit vita nakað um, hvat hetta arbeiðið kann fara at kosta kunnu vit ikki biðja um pening; vit kunnu jú einki patti siga um, hvussu nógv okkum er tørvur á. Í alla 5 milliónir — vit vita einki av vissum. Nú skuldu vit, 3 dagar aftanú at tingið hevur samtykt hesa orduing við søknarstýrið í Vágum og Vestmanna koma við boðum um, at hon skal verða av ongum! Tað kann tingið ómoguligt gera, tað hevði atedgað sakini minst eitt ár. Vit kunnu tó ikki fara og finna uppá at eggja søknarstýrini til nakað og so beint aftanú samtykkja, at tað skal gerast uppá eitt heilt annan máta. Slíkt kann eingin samtykkja.

Hvat annars er framkomið frá tí manni, skal eg ikki nerta við. Tað er ómoguligt at samrøðast við tann mannin. Teir einstaku sakligu spurningar hann dregur fram eru av honum so innvavdir í illfokni og mistrúgv, at tann, ið vil luta

verða at dálka seg og verða bikaðir í svortum, ikki kann innlátta seg í orðaskifti við hann.

J. Samuelsen: Tá eg tosaði um at gera ansvar galdandi móti teimum báðum monnum, sum her hava skipað fyri, so meinti eg ikki við at sela nakað kriminelt undirsøkilsi í gongd. Eg sagði, at vit skuldu gera ansvar galdandi móti teimum, sum hava brúkt so nógvar pengar. Um R. Nielsen følir, at tað eigir at vera kriminelt undirsøkilsi, so má hann um tað. Tingið kann ikki endiliga avhalda hesar pengar. Tá R. Nielsen segði, at mín roða var annulegd til at bevísa, at tað skuldi innleiðast kriminelt undirsøkilsi, so er bara nakað av tí sannheit. Patursson vil nddraga seg at svara við tí motivering, at mínir orð ikki vóru saklig. Eg setti at hesum báðum monnum, tí teir hava borið seg óforsvarliga at við at halda møti í Keypmannahavn og ikki lata triðja mannin vita av. So sigir R. Nielsen, at sambandsmenn altíð hava aungripið tingmannin í Kirkjubø og um grundarlagið ikki hevur verið frægari enn nú, so áttu teir at fara heim og skamma seg. Men vit hava ikki lov at oyso pengar út hjá Føroya fólki fyri at Patursson og Nielsen kunnu flotta sær yvirfyri øðrum londum. Tað er ikki nakað politiskt í hesum. Eg eri forbarmaður yvir, at tað er grund til at angrípa tingmannin í Kirkjubø fyri lætta; men hansara virksamheit í hesi sak bestendur ikki annað enn av punktum, sum nenn kann angrípa hann uppá. Patursson sigir, at aðrir menn ikki eru praktiskir. Men alt sýnir, at hendan sak er soleiðis orðnað, at hesin maður ikki hevur skil á, hvat tað er at grípa oina sak praktisk um. R. Nielsen er eisini ómoguligur sum praktikkari. Patursson plagar at siga, at amtskommunan skal greiða allar sakirnar. Tað er ikki tí, at ikki Patursson heldur, at kommunan kann klára hesa sak betur, men tí, at hann vil, at Ólavur á Heygum, Wedén og statsgældsdirektør Andersen skulu fáa hetta undir hendur, og hvørki kommunurnar ella amtskommunan. Og R. Nielsen fylgir honum. R. Nielsen er trúfastur móti sínum formanni. Men Vágafólk og Føroyingar vilja ikki takka honum fyri tað. Tá og havi fyrisigið, at statskassin skal stýðja kommunurnar, so heldur Patursson, at nútíð uppskot er óhent. tá vit ikki í øygablikkinum kunnu siga, hvussu nógvar pengar tað dugvar seg um. Tann stuðningur, sum staturin skal geva til elektricitetsverk, skal hann geva til kommunurnar. Í stundini eru bonarbrøv inni frá Vági, Vágum og Norðstreymoy, og statsmyndighoitirnar kunnu tí her taka stilling. Og her er Havnin; hetta vilja vit eisini fremja. Eg fekk tað inntrykk frá finantsnevndini, at um sakin dugvar seg um kommunurnar, so var tað lættari at stýðja enn um tað dugvar seg um privatar sakir. Pkt. I er stutt og greitt. Um kommununrnar svara á okkara spurning, vil mann til høvstar kunna senda sakina til ministaran. Og so kann mann tí váss fáa pengarnar. R. Nielsen sigir, at kommununrnar í Vágum vilja hava selskapið til at gera verkið. Teir halda væl har, at tað eru so nógvir pengar til. Men tá vit siga við hesar kommunur, at vit vilja skaffa teimum pengar, lat okkum so síggja, um tær ikki vilja gera tað sjálvar. Samu vil verða við Vestmanna kommunn. Patursson sigir, at tann sum fast við meg, fast við bik. Men Patursson hevur ikki gjort annað í politikk enn at fáast við bik, og hann kann soleiðis ikki blíva svartari enn hann er.

O. Effersøe: Jeg var ikke tilstede, da Patursson talte anden Gang. Under dette forcerede Tempo er det mig ikke muligt hvert Øjeblik at være til Stede her i Salen. I Flertalsberetningen staar der, at man har talt med Justitsministeren om at antage en Ingeniør. Men det var Justitsministeriet selv, som skulde antage denne. Jeg hører, at Patursson har anstillet sine Udgifter i Sammenligning med mine Udgifter til en Rejse, som jeg foretog efter offentligt Paakrav. Patursson har havet 1000 Kr. Mine Udgifter kom ikke op til noget lignende. Vil Patursson oplyse Sagen, bør han lægge alle Oplysninger paa Bordet. Ellers ønsker jeg ikke at tale om den Side af Sagen. Jeg hører, at der har været Tale om vor Stilling til Sagen og A/S. Føroya handil & industri. Jeg undrede mig derover, men nu forstaar jeg, at Hr. Patursson lægger mere deri, end Hr. Fórgarð og jeg har ment. Vi har aldrig ment, at vor Tilslutning skulde være en Anbefaling for Føroya handil & industri, vi mener blot, at hvis Elektricitetet kan leveres ligesaa billig der som andre Steder, saa har vi ikke noget imod at købe denne Elektricitet. Vi faar saa at se, om vi bliver tilfreds med denne Ordning. Det synes, som Hr. Patursson forudsætter, at de Penge, vi har givet ud for Undersøgelserne, vil vi let faa igen. Vi faar dem ikke igen blot ved at nævne Millioner; at de er givet ud er derimod sikkert nok. Med Hensyn til det Sprog. Udvalgsbetænk-

ningen er affattet i, saa maa Hr. Samuelsens Udtalelser sigte til Flertallets Betænkning og det, der er fælles for Flertallet og Mindretallet, for hvad Sprog der er brugt raader Flertallet; Mindretallets Betænkning er affattet paa Dansk. Hvad angaar Hr. R. Niclasens Udtalelse om, at han gerne vil være Vidne, saa maa dertil siges, at han har været Medlem af Udvalget og derfor selvfølgelig ikke kan være Vidne, naar han selv er den anklagede Part. Jeg er fuldt ud enig med Hr. R. Niclasen om, at han har Medansvar ved Engageringen af Ingeniørerne. Jeg betragter det forresten som en ligegyldig Sag, om det er blot Hr. Patursson eller Hr. Patursson og Hr. Niclasen, der har Ansvaret. Hovedsagen er, at vi har sagt os fri; det er Flertallet, der har Ansvaret.

H. C. W. Tórgarð: Eg kann fyri so vítt sluttka meg til R. Niclasen í, at tað er hopleyst at tala meira um sakina her, tí eg standi einsamallur móti tveimrum, men táið talað var um vitni og vitnisforsil, so ver eg ikki tann fyrsti, ið nevndi tað í hesi sak. Eg vil ikki leingja tingsins tíð, men eg má taka upp hvat hrr. Patursson segði um ingeniørlønina, at hrr. Patursson veit, at tað einki er samtykt í millumtinganevndini. Tá vit høvdu fund í nevndini, visti hrr. Patursson ikki, hvat ingeniørtaxtin var í Noregi; tað var eg, sum segði honum frá, hvat eg hevði hoyrt um tær nýggju taxtir. Eg havi ikki úttalað, at hrr. Blauw hevir verið inkompetentur til hetta verk, harímóti hevir hrr. Patursson úttalað um Jón Tórlaksson, at hann ikki hevir verið kompetentur til tað arbeiði, hann hevir gjørt fyri eina kommunu í Føroyum.

J. Patursson: Eg havi aldri kunnað funnið uppá at siga hetta um Jón Tórlaksson, at hann ikki var førur fyri tí arbeiði, hann hevir tikið sær uppá fyri Havnar kommunu, um ikki av øðrum grundum, so tí eg havi kent hann í mong ár sum ein álitismann. Hvat ið viðvíkir tí, Tórgarð sigir, at hann ikki hevir verið samsintur við okkum í øllum, so framgongur tað av tí, ið protokollerað er, at hann hevir verið samsintur við okkum. Viðvíkjandi lon til verkfrøðingin var tað samtykt ikki at gera fastarnál longur enn til Ólavsoku. Tórgarð var samsintur við okkum í tí. Viðvíkjandi valgi av mannin um, so framgongur tað av tí protokollerað, at vit hava haft nógv samráð um hetta. Táið hann finnst so nógv at, at R. Niclasen og eg hava tikið hendu mann, hví hevir so minnilutin ongan mann tikið? Tað var eitt tað fyrsta, ið var okkum álagt at gera, at fáa ein verkfrøðing; um vit ongan høvdu tikið, hevði her ikki verið minni gola av tí, at vit ongan mann høvdu tikið, fyri at Ólavur á Heygum í frið kunni fremja sítt verk. Hetta er ringt af gera við, tá man hevir allan sambandsflokkin á nakkanum í hesari sak. Men hava hesir menn nú verið so dýrir? Eg meini, at í einum tílíkum máli er tað bíligara kortini tað dýrara. Í Noregi fingu vit ongan bíligari verkfrøðing, ongan ið ikki vildi hildið seg til tær norsku verkfrøðingataxtir. Um vit so fóru til Danmarkar, tríggir Tórgarð so, at vit har fingu ein so væl útdannaðan mann í hesum máli í Danmark? Vit kundu kanska farið til Íslands, her hava teir jú eisini slík verk sum í Noregi, men har eru færri menn at velja hartur úr, og teirra verk eru enn so nýggj og smá, at teir kortini enn mega roknast fyri at vera lærisveinar av Nordmonnunum. - - Táið so hrr. Effersøe finnst at, at eg havi talað við justitsministaran og sigir, at hann er ikki ministeriið, so má eg siga, at táið man fer til ministaran á hansara kontóri og man eisini tosar við undirmenn á kontórinum, so hevir man vent sær til ministeriið, um men ikki beinan vegin hevir talað við departementschef Schrøter. Tað standur einki í tingssamtyktini um, at tað skuldi vera skriftligt henvendilsi; eg havi kortini skrivað til ministaran, bæði um at taka ein verkfrøðing og um pening til ferðina til Noregs. Viðvíkjandi hvat Effersøe sigir um, hví nevndarálitið er skrivað á føroyskum máli, ætli eg at siga nakað um tað, táið ein annar sak í dag kemur til viðgerðar.

Edv. Mortensen: Minnilutin hevir framsett 2 uppskot: eina tokulóg og eina lóg um, hvussu skal vera atborið við expropriatión. Í og fyri seg hildi eg, at uppskotini eru góð, men tey eru frankomin so seint, at eg ikki vil kann stemma fyri teimum nú í ár. Tað er vanist eg kundi funnist at, men mest er tað, at tað standur, at nin samtykt, ið logtingið í hesum hevir tikið, skal leggja innankast fyri ministeriinum. Tað hevir ikki verið siður fyrr, og eg meini ikki, at logtingið í hesum skal standa undir ministeriinum. Viðvíkjandi tí fyrsta uppskotinum: »Lov om Afståelse af Grund m. v. til Vandkraftsanlæg« § 1, manglar her nakað; tey kommunalu stýrilsini og logtingið skulu hava rætt til at expropriera arealir, men tað standur einki um, at

viðtøkurnar um expropriatión skulu kunna appellerast. Tað kann jú vera tey kommunustýrir, sum ganga nakað víst yvirfyri privatum monnum. Eftir orðaljóðinum skulu kommununrnar kunna expropriera utanfyri teirra umráðir; eg veit ikki, um hetta er meiningin. Ellars hava kommunur ikki loyvi til tað. Av hesum grundum vil eg ikki stoytta fyri hesum uppskotinum, tó at hað er nógv, sum er rætt.

H. C. W. Tórgarð: Á nevndarfundi 21. var viðtikið at yvirdraga til formannin at kanna eftir, hvar ein ingeniørur kundi fáast. Har skrivaði eg undir og tað er síðani einki frambomið frá mer móti hesi viðtøku. Eg veit ikki, hvat fleirtalið í millumtíðini fyritók, men tað fyrsta, ið fyrilág fyri mær, var at Rasm. Nielsen fortaldi mær hvør maðurin var, sum teir hevdu antikið. Eg segði tá altfyri eitt, hvat eg hevði ímóti hesum manni, ikki tí at hann var Norðmaður, eiheldur tí, at hann var ódugnaligur, men hann var so sterkt interesseraður í einum privatum selskapi. Eg var aldeilis ikki fyri at fáa Íslendingin Tórlakssou til hetta arbeiði, soleiðis sum hrr. Patursson í tað heila tikið heldur av at framstilla tað. Tá hann annans kemur inn uppá, hvat annans er forhandlað og viðtikið okkara millum, m. a. í mínum heimi, so kundi eg herav fikið anleidning til at koma inn uppá eitt og annað, sum er fyrisligið í útvalginum, men sum kanska ikki tolir dagsins ljós. Eg haldi tó ikki tað er hóskandi.

Eg vil henstilla til hrr. Mortensen, at hann ger tey neyðvendugu endringsforslog til uppskotið um expropriatión. Hetta er jú bara 2. behandling.

Formaðurin: Der er endnu en Række Sager paa Dagsordenen. Jeg vil derfor henstille til Medlommerne, at de viser Resignation med Hensyn til Omfanget af deres Taler.

J. Patursson: Eg royndi, tá eg var yviri í Noregi, at fáa ein stafsingenior, men vasdragsdirektørurin sogði mær, at ein slíkur var ikki at fáa. Tórgarð kom ikki yvir, sum hann hevði ætlað og eg hevði vantað, og so tóku vit honda. Tað er einki framlagt til prógv fyri at hesin maðurin ikki dugir: tíðin fer at vísa tað rætta okkara valg hevur verið gott ella ikki.

R. Nielsen: Tórgarð segði, at nakað var fyrisligið í útvalginum, sum ikki toldi dagsins ljós. Eg vil gjarna biðja hann siga, hvat tað er.

A. Samuelsen: Sovitt eg forstandi hesi lóglovslogini um expropriatión eru tey hensigtsmessig og góð. Edward Mortensen hevði tveir innvendingar at gera til teirra, men vit fara ikki at lata vera at viðtaka forslagini av teirri grund. Eg haldi tað vera rætt at henvendilsi kann ske til justitsministoriið í tí tilfelli, at menn ikki er formoyddur við eina viðtøku av logtinginum; ein instansur má jú vera. Havnar býráð er her í sama forholdi sum logtingið. Er tað ein viðtøka av einum forstandarskapi, sum skal pákennast, so gongur tað harímóti til logtingið. Ellars stoytir tað ikki meg nakað serligt, at tað verður apellerað til rættin. Eg haldi hesi bestemmilsini vera rætt forsvarlig eftir tí forstáilsi, eg havi av teimum.

H. C. W. Tórgarð: Eg skal til Rasmus Nielsen siga, at eg haldi tað vera óhóskandi her at útbala seg um, hvat fyrifelst á gotuni. Tá hann annans ræður samhandsmonnum til at pakka saman og skamma seg – hvat tinglimurin Thomsen rópti »hoyra til – so skal eg siga, at teir hava ikki meira grund til at skamma seg enn hinir.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Aðrar málsins einaríddu sakir.

2. viðgerð.

R. Rasmussen greiddi frá tí stutta nevndarálitinum.

J. Patursson: Eg vil siga nokur orð um tað, at justitsministarin hevur biðið amtmannin at syrgja fyri, at øll skrivilsir, sum sendast til hansara hiðani vera á donskum máli. Út av hesum skuldu vit havt skrivað uppskotið til samtykt í fossanevndini og onnur uppskot á donskum máli, tí tey skulu sendast niður. Um hetta hravið frá ministaranum er so at skilja, at Føroyingar ikki eiga at nýta føroyskt skrivligt í málum, sum skulu sendast ríkisstýrinum, so má eisini vera avgjort: Vit skulu *lata* danskt og ikki føroyskt. Tí til tey dokumentir, sum

verða send ministaranum hoyrir hitt munnliga orðaskiftið, og tað kann ministarin tí eisini vilja lesa. Hetta haldi eg ikki, at løgtingið skal fara eftir, so at siga, at vit skulu leggja av at tala føroyskt. Tað er spell at tann ministarin, sum er Føroya ministari, ikki skilir landsins mál. Ministarin fyri Føroyar átti at skilja føroyskt mál. Men tað er ikki. Nú hevur verið so í Íslandi, at teir hava aldri talað ella skrivað annað enn teirra egna mál á altingi. Síðani hevur málið verið týtt til danskt til danska ministaran. Hvør ið týtt hevur, veit eg ikki, men ministeriið hevur vist kostað týðingina. Og soleiðis má tað væl eisini gerast her; tí tað kann ikki verða talað um at geva gætur eftir hesum, at vit skulu lata vera at skriva føroyskt og enn minni lata vera at tala tað fyri tann skyld, at ministarin ynskir tað. — So er tað eitt annað, eg vil mæla nøkur orð um: A. Samuelsen hevur stutt síðani í eini roðu brúkt tey orð um meg, at eg havi sagt eina grova ósannheit her á tingi við tað, at eg segði, at hann í ríksdagshandbókini hevði sagt seg at hava verið fáti og formaður í skútlastjórnini. Hann kallar tað grov ósannheit og brúkar hesi orð tvær reisur ímóti mær. Av tí, at A. Samuelsen ofta er komin framm á líknandi hátt vil eg hesa ferð taka mær fyri at biðja hann taka síni orð aftur. Um hann ikki gor tað, so vóni eg at formaðurin átalar hansara atburð.

J. Poulsen: Jeg har været Medlem af Udvalget og slutter mig til at Udvalget ikke har havt noget at bemærke. Det har været Skik ved denne Forhandling at komme ind paa forskellige Spørgsmaal. Nu skal jeg ikke tale om Ministeren og Regeringen og saadant. Jeg skal holde mig noget lavere. Det er angaaende vor Forsyning med Levnedsmidler. Forholdene er nu blevet saadanne, at Folk føler sig opskræmte over, at der synes at være Knaphed paa enkelte Livsfornødenheder, saasom Hvedemel og Margarine. Jeg ønsker derfor, at Amtmanden eller Formanden for Udvalget kan give os beroligende Oplysninger.

A. Samuelsen: Paturson refererað úr ríkisdagshandbókini, at eg havi verið fáti, settur fáti, og formaður í skúladirektiónini. Eg pástóð, at tað ikki var sannheit. Paturson fasthelt tað. Eg bað hann bevísa tað. Tað hevur hann ikki gjørt enn. Eg biðji hann nú bevísa tað. Eg standi fast til Paturson bevísir at hann hevur rætt.

Formanden: Der er faldet en Udtalelse om Usandhed fra en eller anden Side. Der kan tales om Urigtighed. Betegnelsen »Usandhed« maa man ikke bruge. Vedrørende Joon Poulsens Spørgsmaal angaaende Vareforsyningen, særlig med Hensyn til Hvedemel og Margarine, kan det bemærkes, at da Amtskommunens Varehandel tænkes at skulle afvikles, er man begyndt at gaa bort fra den 3-Maaneders Forsyning. Imidlertid er der ingen Grund til at være ængstelig. Vel har Havnestrejken i København medført, at vi ikke i den Tid Strejken har varet har kunnet faa Varer fra Danmark, og Udvalget har i den Anledning været sammen for at drøfte, hvad der skulde gøres. Derefter har Udvalget henvendt sig til den islandske Regering, som har stillet sig imødekommende og har erklæret, at man deroppe vil kunne undvære Hvedemel og Margarine, som saa sandsynlig vil ankomme hertil med S/S »Island« paa Skibets første nedgaaende Tur. Der er ogsaa søgt om Tilladelse til at faa Varer fra Leith. De 20 Tons, vi nu faar, er tilstrækkelige for den første Maanedstid; Resten vil strække til for et Par Maaneder, og ellers maa man regne med, at Havnestrejken vil holde op i en nær Fremtid, der kan ikke være betydelig Mangel, da der maa ligge Beholdninger hos Købmændene.

A. Samuelsen: Táið formaðurin pátalar nakað, má man boyggja seg fyri tí. Men eg má spyrja, um amtmaðurin vil pátaka sær at taka ansvarið fyri, hvat J. Paturson hevir framført um meg, tí so vil eg siga, at um so skal verða, má amtmaðurin fyri mær gjarna halda ting við sjálvstýrismonnum, tí so haldi eg, at sambandsmenn hava einki meira her at gera.

Formaðurin: Formandens Afgørelse kan ikke diskuteres. Ellers forekom det Spørgsmaal, der blev rettet til mig, aldeles ubetimeligt. Det er kun slaaet fast, at Betegnelsen Usandhed og grov Usandhed ikke er tilladt.

V. Debess: Tað er siður, at man her kann retta ynskir spurningar til amtmannin, táið hetta mál er til viðgerðar. Tað er kunnugt, at nógv ungfólk heiðani vitjar til háskúla bæði her og í Danmark, og tað hevir verið siður at geva teimum studning frá tí almenna. Í ár hevir man frá ungfólki hoyrt, at tey hava undrast yvir, at so fá hava fingið studning ímóti árum frammanundan. Nú kann tað vera,

at fyri hvort ár fleiri og fleiri ungfólk sokja heinda studning, og at tessvegna eitt minni procent fær part í honum. Men í ár hava av 24 ungum dreingjum, ið hava sokt studning til at fara til Danmarkar, bert 3 fingið studning, og til Føroya Fólkaháskúla hava 13 sokt og bert 6 fingið studning. Eg var á amtsskrivstovuni fyri at fregnast um grundirnar til tess, og svarið var tað, at har var beinan vegin eingin peningur eftir. Eg vil spyrja amtmannin, um haun hevir gjørt, hvat gerast kann, fyri hesum máli, og um haun hevir ansað, at vit fáa líka nógvan studning uppá okkum her í Føroyum sum niðri í Danmørk.

J. Patursson: Táið A. Samuelsen í áðni segði, at eg í »Rigsdagshaandbogen« hevði skrivað meg sum ónara av Kirkjubøgarði, so havi eg ongantið givið handa upplýsing frá mær, men ein annar maður hevir skrivað tað, og tað er fylgt við í útgávuni í 1919. Men eg segði í áðni, at tað var í hvussu er ikki verri, enn at fólkatingsmaðurin stendur har sum fúti og formaður í skúlastýrinum. Eg skal loyva mær at lesa upp, hvat har stendur: »Samuelsen, Andreas, valgt paa Færoerne, Sysselmand, f. 1. Juli 1873, Søn af Husmand Samuel Joensen, Landfoged 1910, Formand for Skoledirektionen paa Færoerne 1908—13, Formand i Østero Præstegalds Forligskommission« o. s. fr. — Nú sigir A. Samuelsen, at tað er ein bondbók, ið er givin út av »Rigsdagsbureauet«; og havi ikki kunnað funuið hana: eg talaði um »Rigsdagshaandbogen«, og tað har stendur, havi eg nú lisið upp.

R. Rasmussen: Eg hoyri, at amtmaðurin sigir, at har var ein nóg so fittur beholdningur av amerikanskum hvoitimjøli í Tinganesi, og at hann er svunnin so skjótt við tað, at tað frættist, at prísurin á amerikanskum hveiti fór at hækka. Tað er eitt bundið forhold millum sølu av rug og hveiti, og so skjótt, tað er ov lítið av øðrum, so má handilin syrgja fyri, at tað verður regulerað. Tað er sagt mær, at tað eru nógvir handlar í Føroyum, ið hava bert hveiti, og aðra staðni hava teir meira hveiti enn rug, og tað má vera, tí tað er illa regulerað.

Formaðurin: Siden Hr. N. Debess bad om Oplysninger vedrørende Understøttelserne til Folkehøjskoleelever, saa er der hertil bevilget et bestemt Beløb, og det bliver fordelt paa de forskellige Amter efter Skøn. Hvorfor der i Aar er færre heroppe, der har faaet Understøttelse end de foregaaende Aar, er fordi det blev vedtaget i et Skoledirektionsmøde at forhøje Understøttelserne. Til Hr. R. Rasmussen vil jeg sige, at Kontrollen føres paa den Maade, at naar Brødkortene kommer ind fra Købmanden, skal det kontrolleres, om de har brugt Mel i det rette Forhold. Nu drejer det sig om et kort Tidsrum, og det er endnu for tidligt at dømme om, hvorledes den endelige Opgørelse af Brødkortenes Fordeling mellem Hvede og Rug vil forholde sig.

R. Rasmussen: Hatta er beint, men so vítt eg minnist, má har regulerast eftir einum vissum skjønn. Viðvíkjandi háskúlanæmingunum, so er studningurin til danskar háskúlanæmingar hækkaður ógvuliga nógv; og havi frætt, at teir kunnu fáa upp í 45 kr. um mánaðin í tað mesta, og eftir tí eg veit, kann hvørt amt, ið vil, fáa maximumsstudning. Nú vil eg spyrja: hevir amtmaðurin søkt um at Føroyar fáa maximum? Eftir ti eg veit, ger ministeriið í hesum beint sum amtmaðurin biður um. Færøyar vóru leingi heilt utanfyri heinda studning, men nú táið vit hava fingið part í honum, eigu vit at draga fulla nyttu av honum. Tað er nakað exceptionelt, táið 24 søkja, at so bert 3 fáa studning og av 13 bert 6.

Edv. Mortensen: Táið ikki meira er á »lagere« av einari vøru, so er ómuguligt at regulera so at allir handlar hava eins nógv, tað má sjálvandi vera so, at sumir handlar selja skjótari út enn aðrir, og í teimum verður fyrst trot. Viðvíkjandi hesum hveitimjøli, er forholdið tað, at keypmennirnir hava fikið nakað meira og skjótari av tí, við tað at tað frættist, at prísurin fór at hækka. Heilt nøjaktiga kann ikki regulerast, um ikki av øðrum grundum, so av hensýn til Smiril, hann kann ikki sigla alla staðni íenn.

N. Debess: Eg gangi út frá tí, at so gott sum allir, ið sokja um studning til háskúla, átta at fingið hann, og tá eg við R. Rasmussen vil biðja amtmannin granska hetta og royna at fáa maximumsstudning, so vil eg ganga eitt sindur víðari og biðja amtmannin royna at fáa eitt sindur meira, enn nú vanliga gevst sum maximum.

Formaðurin: Der vil blive sagt om at faa Tilskudet forhøjet, men der er endnu ikke sagt derom.

— —

Frásøgn sanatoriinevndarinnar.

2. viðgerð.

Ordfarain (N. Debess) greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at samtykkja uppskotið.

H. C. W. Tórgarð: Eg havi verið limur av hesum útvalginum, og vit eru í sjálvum betonkningunum fullkomið einigir. Eg skal eisini mæla tinginum til at stemma fyri hesum uppskoti. Tað er langt og umfatar ein hóp, og kanska ikki allir tinglimirnir hava lisið tað. Her er fyrst at taka til forholdið hjá maskinpassaranum. Hann hevur fasta løn, men hevur eisini havt nakrar fastar rættigheitir, sum vit meina kunnu vera til skaða fyri driftina. Hann hevur solciðis hildið kríatúr, meðan sanatoriið sjálvt ikki hevur átt slíkt. Her var komið eitt keðiligt forhold við tað, at man ikki kann dœma um nær ein slíkur maður arbeiðir fyri seg sjálvan og nær hann arbeiðir fyri sanatoriið. Vit vilja við hægri løn sláa fast, at hann er maður hjá sanatoriinum og tí ikki nýtist hesar rættigheitir.

O. Effersøe: Naar der i Aar foreslaas Foranstaltninger, som vil koste en Del Penge, saa maa det være under den Forudsætning, at de ikke ydes af Amtskommunen alene, men ogsaa af Staten. Om det alene drejer sig om Amtskommunen, saa vilde man maaske have holdt mere igen. Med Hensyn til Sanatoriet har jeg i Tider, hvor det ikke har gaaet, som det burde, gjort mine Bemærkninger, og jeg har sagt, at det, som kræevedes, var Personskifte, ikke blot Foranstaltninger. Og derfor venter jeg heller ikke at der ved disse Forslag vil opnaas nogen tilfredsstillende Ordning. Blandt Foranstaltningerne tidligere har været den, at man sendte Sanatorieregnskabet til Nationalforeningen for at revideres, naar man brugte mer end nødvendigt. Og man fandt der, at paa forskellige Poster brugtes der mere, end der burde bruges. Har man nu tænkt at træffe nogen Foranstaltning i denne Retning? Man kan ikke rigtig have Begreb om det økonomiske uden at man foretager den Slags engang imellem. Jeg har anset det for rigtigt, at der bruges, hvad der skal. Men det er forkert, om man tror, at man ved et Sanatorium nødvendigvis maa være flot og rigelig. Det er hverken nødvendigt eller rigtigt. Jeg vil dog ikke herved sige, at man bører sig saadan ad; man har tidligere i en Periode gjort det. Jeg mener, at der bør lægges stor Vægt paa, at den Mand, man har deroppe, at hans fulde Arbejdskraft blivor udnyttet og udnyttet i den rigtige Retning. Der er den Skavank ved Sanatoriet, at der ikke er nogen fast ledende Aand deroppe — en Slags Direktør. Institutionen kan ikke vel bære en saadan Post, men derfor bliver det alligevel paa bedste Beskub. Jeg ved ikke, hvem der har den største Indflydelse der. Hvor meget Udvalget kan gøre sin Indflydelse gældende paa Sanatoriets daglige Drift, er et Spørgsmaal. Der er Økonoma, Oversygeplejerske og Maskinpasseren. Driften maa i nogen Grad bero paa den Tilfældighed, hvem af dem, der er den kraftigste. Og et saadant Forhold er ikke rigtigt. — Jeg kan ikke give Anvisning paa en mere tilfredsstillende Tilstand deroppe. Men om man kunde faa en sikker og god Ledelse, vilde det vel blive bedre. Som Lagtingsmand kan man ikke have Indflydelse paa Sanatoriets Forhold uden at give sin Tanke tilkende ved nogle Ord. Om man var med i Sanatorieudvalget vilde man maaske kunne udrette noget, men nu er man afskaaret derfra.

N. Debess: Eg havi einki ímóti, at roknskapurin verður sendur til »Nationalforeningens fyri at reviderast. Eg vil sotla, at um slíkur roknskapur kemur aftur við atfinningum frá »Nationalforeningen«, vilde løgtingið handla eftir teimum atfinningum. Tá Effersøe sigir, at tað hevur verið gjørt at senda roknskapin til »Nationalforeningen« og at har hevur mann funnið nógvar manglar í roknskapinum og nógv, sum ikki var forsvarligt — tá var annleiðingin til at fyritaka personskifti. Tá var neyðugt at gera tað. Men sum alt liggur frammi nú, kann eg ikki taka aðra støðu enn eg sum navndarlimur havi tikið. Tað er ikki bara ein pengaspurningur, sum her er at takast við. Effersøe sigir, at tað hevði verið hent um hvar var ein direktørur. Men nevndin er klár yvir, at skal tað her setast uppskot framm, so kemur tað at dreja seg um ein embætispost. Vit kunnu ikki fáa nakran persón har niðan, utan at hann hevur sítt broyð av tí. — Hvussu ið hevur tað størsta orðið at siga? — næst eftir nevndini, má tað verða læknin. Tað skal ansast eftir bæði utan og innan, og tað er ógjørligt hjá nevndini at gangа har niðan dagliga til eftirsýn. Tá ongin direktørur er, so er tað doktarin, sum er hægstur. Tað framgongur av reglumen-

tinum, at maskinpassarin fyrst hevur at akta økonomu og sjúkuræktarsku og síðani doktaran. Sjálvt um maskinpassarin fær ordru frá økonomuni, so kann læknin umstoyta tað. Tí ein og hvør má sanna tað, at ein maður sum maskinpassarin, ið verður settur haruppí, hann kann ikki hava øll møgulig monniskjur yvir sær, bæði læknan, og sjúkrøktarskuna og økonomuna o. s. fr., hann er kortini ein vaxin maður, ið fær sínar instruxir og annars er undirgivin onkrum ávísum persóni. Viðvíkjandi tí at senda roknskapin niður til »Nationalforeningene, eri og heit samsintur við hrr. Effersøe.

O. Effersøe: Der kan være noget i ikke at sætte Lægen som Nr. 1 med Hensyn til den økonomiske Drift. Efter mit Kendskab til sligt, har Lægerne en Tendens til at sætte alle Udgifter Driften vedrørende saa højt op som muligt. Med Hensyn til Udgifterne finder jeg her en Post til Anskaffelse af Ligvogn og Bygning af Vognskur. Jeg finder det ganske betimeligt, at der anskaffes en Ligvogn, men Sanatoriet har dog bestaaet i 13 Aar uden en saadan, saa man kunde vel, nu da alle Priser er abnormt høje, vente lidt endnu til Priserne falder. Til Papning og Maling er opført 2000 Kr. Jeg nværdige har i min Tid fundet dette nødvendigt, men jeg maatte bøje mig for Sagkundskaben, der mente, at det var nødvendigt. Nu maa Sagkundskaben altsaa være kommet til et andet Resultat. Til 6 Servanter med Afløb er opført 700 Kr.; ja, er de saa aldeles nødvendige paa det nuværende Tidspunkt?

S. P. úr Konoy: Eg má geva hrr. Effersøe rætt viðvíkjandi sakkunnskapi; tá vildu teir endiliga hava staffaðan vegg, ið kundi vaskast; nú siga teir, at tað er aldeilis neyðsynt at hava glattan vegg, og at hitt er heilt farligt. Eitt annað, ið sakkunnskapurin endiliga kravdi, var rúm til at turka tøy í, og so táið tey vórn bygd, noyddust vit at byggja hjallar til at turka í. Táið Effersøa sigir, at alt er ov hátt á sanatoriinum, so var tað ein tíð, tá tað varð spart ov nógv har uppi, og tað er ikki gott, at tað kemur út millum manna, at á sanatoriinum er ikki gott at vera. Eg má geva Effersøe rætt í, at tað er eitt stað, hvar tað kann dømast um tað, og tað er »Nationalforeningene. Viðvíkjandi persónunum, so meini eg, at løgtingið kann geva nevndini myndugleika til at ansa eftir hesum viðurskiftum; er tað so tað, at hesi eru so óheldugir persónar, so mega teir ikki vera har til skaða fyri sanatoriið. Um vit skulu hava ein inspektør har uppi, so verður tað dýrari enn nú, men sjálvandi, um vit fingu tann rætta mann til tess, kundi tingið vael spart pening í longdini. Men tingið má geva millumtinganevndini eitt ávíst úttalilsi herum, nevndin kann ikki fungera sum inspektør.

N. Debess: Eg kann vera samsintur við Effersøe í tí, at man kann ikki til allar tíðir vera so heldugur at hava ein læknu, ið er ein góður økonom; men eitt fer læknin at ráða yvir, nevniliga matinum; eg hugsi ikki, at nøkur millumtinganevnd vil tala at, táið læknin krevur tað og tað til matna til sjúklinganna, og tað verður jú so, at tann størsta útreisla har uppi er til tess. So læknin kemur at hava nógv at siga fyri sanatorisins økonomi. Viðvíkjandi teim vøskum, ið skulu setast upp har uppi, kundi tað kanska bíða eitt sindur enn, men tað meinast, at hetta eigir at vera gjørt nú, tað var samtykt at gera í 1913 og er síðani útsett. Hetta er ein lítil postur og smittuvandi nú jú roynast at fáast burtur so nógv sum møguligt, so vøskini vilja gera stóra nyttu. Tann núverandi økoni heldur, at har er brúkt ovlítið av ymiskum vørum, ið keypast skulu, t. d. frukt, til tess verður altso ein nýggj útreisla. Hann meinar ikki, hann kann ávísa, at økonoma í nøkrum hevir verið ov flott. Nevndin má taka eftir, hvat læknin sigir, teirra millum má vera eitt samarboiði og eitt gott forstáilsi.

M. Samuelsen: Eg eri samsintur við hinar menninar í nevndini, serliga skal eg halda meg til mín meiningsfelaga Tórgarð. Tær broytingar, vit fyrisláa, eru eftir hvat ið vit halda vera nevðugt at gera. Serliga hvat ið viðvíkir máling o. t., haldi og tað vera ógvuliga viktugt, at tað verður gjørt sum skjótast; tað hevir drálað nógv ov leingi. Eg skal ikki koma nærri inn uppá oinkultheitir. Hvat ið viðvíkir tí at brúka ein meira radikalan framgongdsmáta við at róta upp í persónsviðurskiftum, so vil eg ikki vera við til tess, tí eg eri ov ókunnugur við tað, og vit hevdu allir beteinkiligheitir við tað. Vit hava roynt at fáa fólkini har uppi so vael avlagd, at tey kunnu anvenda alla teirra tíð uppá teirra arboiði. Vit hava roynt at handla so forsvarliga vit hava kunnað.

O. Effersøe: Indenfor Lagtingets Mindretal har der været Enighed om, hvorledes vi

skuldu forholde os, men dobbe maa ingenlunde opfattes saaledes, at vi slutter os til det foreliggende Forslag. Iøvrigt vil jeg henvise til vor Betænkning.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Fundur tisdag 23. september kl. 10.

Formaðurin: Der forefaldt forleden Dag en Episode her i Tinget i Anledning af et af Hr. Andreas Samuelsen brugt Udtryk. Jeg paatalte, at Hr. Samuelsen havde anvendt dette Udtryk. Siden er jeg blevet gjort opmærksom paa, at Hr. Patursson forinden havde sigtet Hr. Samuelsen for mod bedre Vidende at have givet urigtige Meddelelser til Rigsdagshaandbogen. Selv om altsaa det af Hr. Samuelsen brugte Udtryk »grov Usandhed« maa paatales, saa er det altsaa Hr. Patursson selv, der har givet Hr. Samuelsen Anledning til at fremsætte det.

J. Patursson: Hvat hasum viðvíkur, at eg skal hava siktað Andrass Sámalsson fyri at hava horið ósonn boð til ríksdagshondbókina, so er at siga, at hann fyrst hevði siktað meg fyri at hava skrivað nakað, sum eg faktisk ikki hevði skrivað. Eg var kortini ikki so frekur at siga, at hann hevði sagt eina »grova ósannheit«, tó eg hevði alla grund til tað. Eftir tí, sum formaðurin nú hevur hildið fram má eg halda, at eg havi haft rætt til at beskylda Andrass Sámalsson fyri »grova ósannheit«. Eg havi als ikki siktað hann fyri nakað, men bara sagt sum satt var, at so og so stóð um hann í ríksdagshondbókini. Um tað kann ska tendur nakað annað í eini aðrari bók, veit eg ikki. Míni orð vóru sonn.

Eg skal ikki óttala meg meira harum, men bert siga nokur orð um forrættingsordanin. Tað er aldeilis ótilbørligt, sum hasin lingmaður hevur úttalað seg úr. Eg kundi nevnt so mong dømir. Um dagirnar segði Andrass Sámálsson, at Effersoe sum onganting »við tí størsta plaseri kundi givið sjálvstýris mannum ein framman á«, tað vil í donskum siga: »sat paa Kaften«. Eg páfaladi hesi úttrykk sum liggjandi heilt utanfyri alt, sum mann er kendur við í parlamentariskum forsamlingum. Tí dróg eg tað fram, so vit harvið kundu komið til betri tingakikk. Føroya lagting er ikki til at kenna aftur frá teirri tíð, amtmann Borentsen leiddi tingið. Tá var tað ein virkutlig parlamentarisk forsamling, tá fekk eingin loyvi til ópátalaður at framseta tann minsta misgruna móti einum øðrum tinglimi. Síðani er tónan her á tingi lækkað meir og meir, meðan hin seinasti amtmaðurin ráddi her og tað er tað sama nú. Løgtingið er við hesum lag verðið ein skandala fyri Føroyar, tað kennist ikki slík parlamentarisk forsamling í verðini. Tað sær út sum hesin nevndi tingmaður og teir, ið hann styðja, vilja oyðileggja løgtingið, fáa tað til at smøkka niður til at verða eitt kellingating, har einki er ov groft at siga.

Formaðurin: Det glæder mig, at vi er komne ind paa Spørgsmaalet om Formen for Forhandlingerne her i Tinget, thi den har ofte paa flere Omraader berørt mig pinligt. Det vilde ogsaa glæde mig, om vi i næste Samling kunde komme ind paa en mere saglig Tone. Det er overhovedet en Betingelse for, at Tinget kan indtage en værdig Holdning, at Medlemmerne møder præcis og lader de forskellige Mellemværender blive udenfor Diskussionen. Vi maa se til at komme bort fra den skarpe personlige Tone.

O. Effersøe: Jeg vil ikke optage Spørgsmaalet om, hvorvidt Lagtingets Forhandlinger fremgaar paa en værdig Maade eller ikke, og hvem der da er Skyld deri. Men jeg vil bestemt protestere imod, at Patursson har fremdraget en bestemt Amtmand og lagt Skylden over paa denne; det har han aldeles ikke Ret til. I denne Sammenhæng vil jeg fremhæve, at det vel altid vil være saaledes, at en Amtmand, der ikke er fuldt ud kyndig i Færøsk, ikke saa let kan gribe ind i Diskussionen som ønskeligt kunde være, men Medlemmerne bør derfor give saa lidt Anledning til Paatale som muligt. Jeg vil ikke udtale mig om, hvorvidt jeg optræder sagligt eller ej, men jeg kan ikke negte, at det falder mig svært for Brystet at høre Hr. Patursson optræde som Vogter af den gode Tone i Tinget. De Undskyldninger, Hr. Patursson har fremført for sin Optræden mod Hr. Samuelson, gør ikke Sagen stort bedre. Der burde være fremkommet en Erkendelse fra hans Side af, at han ikke havde optraadt rigtigt. Det vilde i det hele taget være heldigt, om alle Medlemmerne vilde erkende, naar de har begaaet en Fejl. Jeg modtager gerne en Undskyldning, naar den fremsættes straks. Hvad angaar For-

mandens Udtalelser, saa forstod jeg dem saaledes, at Formanden paatalte, hvad Hr. Patursson havde udtalt overfor Hr. Samuelsen. Jeg vil tillade mig at spørge, om det ikke var Meningen, at Hr. Paturssons Udtalelser var af en saadan Art, at de burde paatales.

Formaðurin: Patursson sigtede Andreas Samuelsen for mod bedre Vidende at have udfyldt Skemaet til Rigsdagshaandbogen fejlagtigt. Det var en Formærmelse, og den paataler jeg.

Edv. Mortensen: Tað er ivaloyst, at tónan í løgtinginum eigur at vera betri enn hon er. Tað kundi eisini vera hent, um teir politisku flokkarnir talaðu seg saman um sakirnar í partímøtum. Tá so sakirnar komu til 2. viðgerð, kundi orðførararnir fyri tað mesta fært orðið, so at ikki sakirnar blivu diskuteraðar heilt um aftur við 2. viðgerð. Vit diskutera ov nógv upp í saman.

J. Patursson: Eg veit ikki, um eg segði, at A. Samuelsen móti betri vitandi hevði sett hetta í ríksdagshandbókina. A. Samuelsen segði, at og hevði sett í ríksdagshandbókina, at og var eigari av Kirkjubøur garði. So segði eg nei. tað kundi ikki bera til. Eg fór so til A. Samuelsen aftan á møti og spurdi, hvat tíð hettar var frá. Hann segði, at tað var í 1903. Eg kom tá eftir, at tað var A. Evensen, sum hevði skrivað tað. Men hetta er í hvussu er ikki verri, enn at hann stendur fyri at vera fóti og formaður í skúladirektiónini. Eg segði ikki at og siktaði hann fyri sjálvur at hava skrivað tað. Soleiðis liggur hetta fyri. Ríksdagshandbókina havi eg her hjá mær og hon er til skjals. Tað fell ikki mær inn at siga við Andrass, sum hann segði við meg: At tað var ein grov ósannheit av mær. Um formaðurin nú heldur tað vera galið, at hann hevur pátalað tað sum A. Samuelsen segði, ja, so má tað standa fyri hansara egnu rokning. Tá Effersøe segði, at tað kann ikki leggjast á nakran bestemtan formann, at tónan á tinginum er vorðin so ring, so er hetta aldeilis skoivt sagt. Effersøe hevur verið í ríksdagimum og haðani veit hann, at tað er eina formaðurin, sum tað kemur ann uppá. Tað er eina formaðurin, sum skal stýra so, at tað verður góður tingsiður. Og hevði tað verið amtmaðurin Bærentsen, sum skilti so væl føroyskt mál og hevði so gott parlamentariskt vit, so var løgtingið aldri komið so langt niður sum nú. Tað er tí tíð til at fáa ein Føroying til amtmann. »Tidens Fylde« skuldi vera komin, tá amtmaðurin Ryttor kom.

Formaðurin: De Medlemmer, som ønsker at udtale sig om dette Punkt, maa fatte sig i Korthed, da vi ellers ikke kan blive færdige med Sandingen i Dag.

O. Effersøe: Jeg maa i Modsætning til Patursson hævde, at Tonen i Tinget og Værdien af Tingets Forhandlingsmaader i overordentlig høj Grad afhænger af Tingets egne Medlemmer. Naturligvis har Formanden en vis Indflydelse, men det er umuligt for ham at lede Forhandlingerne som de bør være. Naar Patursson talte om Folketinget, saa kan det ofte der være vanskeligt for Formanden at begrænse Forhandlingerne. Patursson indkastede et nyt Moment: Vi (Selvstyremænd) har villet have en valgt Formand, men jeg og de andre af mine Partifæller har modsat sig det. — Her er vi straks inde paa et Spørgsmaal om, hvem der har Skyld og hvem ikke. Og dette vil jeg ikke nu begynde at diskutere om. Med Hensyn til det, som Mortensen nævnte, at man skal væsentlig indskranke sig til at lade Ordførerne tale, saa bør man bestræbe sig derfor. Men det er netop den Fremgangsmaade, som vi i vort Parti har benyttet saa overordentlig meget. Under Forhandlingerne ved 2. Behandling af Sagerne og dels ved 3. Behandling gentager man for meget. I den Henseende forsyndes der ikke saa lidt. — Den sidste Amtmand tog praktisk paa Tingene og han forbød enhver Omtale af politiske Sager, hvor andre Sager var for. Man maatte saaledes ikke nævne Aaret 1906. Man maatte kun komme ind paa fremmede Spørgsmaal under »De af Amtmanden ene afgjorte Sager«. Nu har vi haft flere politiske Sager, og saa er hele Rummelen kommen op, og de politiske Spørgsmaal har besværliggjort Arbejdet. Angaaende Bogen, da sigter jeg til en lille Bog, som Rigsdagsbureauet udgiver, hvor hvert Medlem opgiver, hvad han er o. s. v. Af mit Kendskab til disse Bøger og til Rigsdagens Bureau foregaar Affattelsen af Bogen ved, at der indhentes Oplysninger fra de paagældende Medlemmer. Der trykkes først et Fortryk, som bliver forevist Medlemmerne, som saa kan foretage Rettelser.

J. Patursson: Tað er vist, at formaðurin ikki kann gera við at vitloftigir tingmenn standa og tala upp í saman. Eg havi ikki nevnt um tað. Men formaðurin kann gera við, at tónan verður

sámilig. Tað er her, at formaðurin kann siga til. Hetta vil hann altíð kunna ansa eftir. Hann kann ansa eftir at tað ikki vera nýtt úttrykk, sum ikki eru parlamentarisk. Efforsøe sagði, at Rytter forbjóðaði at nevna árið 1906. Men tað varð tó nevnt, meðan tinglimirnir tá fóru at kalla tað syndafallsárið ella árið millum 1905 og 1907.

O. Effersøe: Patursson vil erindre, at jeg ikke blot sagde 1906, men i det hele taget politiske Sager. Naar Patursson føjer til, at man undgik at nævne selve Aaret 1906, viser det, hvor vanskeligt det er for Formanden at faa Medlemmerne til at overholde den parlamentariske Tone; de mere behændige slipper fri.

J. Patursson: Antin vit siga 1906 ella árið millum 1905 og 1907, so hevur tað ikki tað allarminsta at gera við, hvat sum er parlamentariskur siður.

Líkning til løgtingið.

3. viðgerð.

M. A. Winther mælti til at samtykkja líkningina.

Hetta varð samtykt.

Føroyskt løgsavn.

2. viðgerð.

Edw. Mortensen greiddi frá nevndarálitinum og mælti tinginum til at samtykkja at biðja stjórnina geva stuðning til útgávunnar.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Sjúkrahús í Vestmanna.

2. viðgerð.

R. Nielsen: greiddi frá nevndarálitinum og mælti til at útseta sakina til næstá ár.

J. Gattesen: Eg havi eisini verið limur av nevndini og havi sluttað meg til at biðja amtmannin til næsta ár fáa upplýsing um ognarforhold o. s. fr., so vit kunnu royna tá at loysa sakina. Eg trúgvi ikki, at annað er at gera í ár, tí sjúkrahúsið skal byggjast av einum tilfari, ið tað ikki er gott nú at fáa yvirlag yvir. Eg vil biðja tingmenn stemma fyri nevndaruppskotinum.

Sakin fór til 3. viðgerðar.

Lántøka.

3. viðgerð.

M. A. Winther: Eg vil mæla til at samtykkja nevndaruppskotið.

Tað varð samtykt við 12 atkvøðum.

Jarðamoðraskipanin.

3. viðgerð.

S. P. úr Kongi: Eg skal mæla til at samtykkja nevndaruppskotið.

Tað varð samtykt við 14 atkvøðum.

Sala av prestagarðsjørðini.

3. viðgerð.

J. H. Poulsen: Hetta lógaruppskot hevir ligið frammi leingi, so og má trúgva, at allir tingmenn nú eru vel kunnugir við tað; tað er eisini so nær skylt við uppskotið, ið var sett fram av búnaðarnevndini, tann einasti munur er, at tað fyrisær sølu til privatar, helst til kommunur. Tað er framsett eitt uppskot av einum tingmanni um, at sakin verður útsett til næsta ár.

Eg havi loyvt mær at framseta broytingaruppskot, ið gongur út uppá at sikra teimum, ið hava verið uppsitarar á gørðunum, at fáa teir í festi. Eg skal mæla til,

at tingið samtykkir hetta uppskot. Tað er samfundsgagnligt, at jørðin kemur yvir á áðrar hendur enn hon er nú.

O. Effersøe: Jeg er stemt for, at man søger at komme bort fra den nuværende Brugsform af Præstegaardsjorderne og er stemt for Salg til Kommunerne. Men jeg havder, at Sagen ikke har gennemgaaet en tilstrækkelig grundig Behandling. Jeg maa fremhæve, at Lovforslaget ikke har ligget længe fremme, som det er hævdet af Ordføreren; det har kun ligget fremme i et Eksemplar, og der er store Forskelligheder fra Landbokommissionens Forslag. Det eneste, vi kan gøre, synes jeg, er at vedtage Forslaget paragrafvis, og saa sende det til Regeringen uden at vedtage det endelig, for at høre Regeringens Stilling hertil. Dette er et nyt Spørgsmaal, der foreligger, og et vanskeligt Spørgsmaal.

J. H. Poulsen: Eg skal viðganga, at uppskotið havir ikki ligið so leingi frammi sum kanska ynskjandi var. Men eg má ganga út frá, at teir 7 nevndarmenn allir kendu tað, og hinir hava haft góða atgongu til at læra tað at kenna. Tað havir ligið frammi í meira enn 1 eintaki; um hrr. Effersøe bert havir sæð eitt eintak, enn hini tikin.

R. Rasmussen: Eg má loyva mær at siga nokur orð, við tað, at eg havi halt eina serstøðu í nevndini. Tað er í grundini 2 princip, her oru frammi, táið eigindómur kemur undir løgting ella kommunur, og tað er, hvussu vítt skal tað vera loyviligt at selja jørðina út aftur til privatmenn ella ikki. Tað er hor, eg havi tikið serstøðu. Soleiðis sum samfundsforholdini eru kann tað vera heldur torfort at seta reglur um, at eingi skal kunna seljast. Eg vil tí ganga við til at selja tað minst møguliga og so, at tað, ið selt verður, verður sett undir kontrol. Hin parturin av átvalginum — nakar betonkningar er tó ikki avgivin — tokar fyri so vítt eisini tað hensýn uppí, at tað ikki má verða frítt salg, teir seta tí vissar innskrenkningar yvirfyri tí, ið selt verður. Men hesir innskrenkningar eru so leysir og so lættir at umganga, at tað praktisk talað eftir teirra uppskoti kann finna almindiligt salg stað. Hetta vil eg bestemt tilráða ikki at samtykkja. Vit seta okkum ein merkiligan minnisvarða í 1919 við at gera lóg um, at jørð skal fara undan samfundsins hondum til privatmenn. Vit ikki bert ganga beint ímóti tí stroymi, sum nú á døgum merkir allan samfundsútvikling, og sum meir og meir gongur burtfrá allari privatogn, men vit hava alla grund til at ansa okkum av teimum nógvu avskrekkjandi exemplum her í hýnum uppá hvat tað kann fara til, at jørð verður útboðin til privatsalg. Tað er sjálvsagt ikki lætt hjá ikki lógkonum at stilla eina lógparagraff upp, so ein er tilfriðs við hana sjálvur. Her er eitt motiverað endringsforslag framsett, hvar forslagsstillararnir enn eingir við meir um at solitið sum møguligt av jørðini skal fara til salg. Tað sigst herí: »Salg til Private indskrænkes til det mindst mulige«. Eg kundi tonkt mær hetta skoytt aftrat mínum uppskoti, og heldur ikki havi eg nakað ímóti at orðini under éte verða strikaði, so sum fyrisligið er í broytingaruppskotinum. Hóttar er annar parturin av endringsforslaginum, hin parturin er um embætisgarðarnar. Tað var kanska gott, um teir komu við altfyri eitt, men annars kunnu teir eisini híða til tess kongsjørðin kemur til viðgerðar. Eg skal tí ikki grunja meg um embætisgarðarnar ikki koma við hesa ferð. Harímóti vil eg bestemt páhalda at salg av jørð ikki verður tilsteða eftir fleirtalsforslaginum. Tí skal eg mæla til, at teir tingmenn, sum vilja hava, at minst møguligt av jørð verður selt í privatmanna hendur, stemma fyri § 8 í broytingaruppskotinum, í hvussu er, og um teir eru fyri at teir, sum leigutaðir hava, og uppsitarar fáa fortrinsrætt til fasti, sum teir hava krav uppá, so eisini at stemma fyri tí nýggju § 13 í endringsforslaginum. Ellars vil eg yvirhovur mæla til at stemma fyri tí motiveraða endringsforslaginum.

Effersøe raðir til ikki at gjøgnumfara hesa sakina í ár, tí hon ikki er nógmikið behandlað í tinginum. Tað sær kanska nakað ógjolla út, at bert forslag kemur fram við ongum betonkningi, men við tveimum endringsforslogum vinna staðni frá uppi í sær og tilsíðst ein heldur lítaloysur berattningur. Vist er tað, at hetta er eitt fýlningarmikið verk og avgera vit nakað her, so mugu vit vita tað, at vit harvið hava sett nin lagd niður, sum vit ikki seinni skjøna utanum. Eru vit fyri tí, at jarðabrúkið í Føroyum ikki skal ganga yvir á spekulatiónshendur, so eiga tingmenn at betoinkja seg væl, áðrenn teir stemma. Eg vil anbefala at stemma fyri tí motiveraða endringsforslaginum.

J. M. Hansen: Hesuna sakin er av so ingripandi natúr, at og lagdi hon tolir

at útsetast til næsta ár. Fyri tað er hetta arbeiðið, sum nú er gjørt, ikki burturspilt.

